

RED: 10 X



Nasjonalbibliotek

Nasjonalbiblioteket
National Library of Norway
Rana Division
N-8607 Mo i Rana
Telephone: +47 75 12 11 11 Telefax: +47 75 12 12 2

LØGTINGS-TIDINDI

1995

Løgtingstíðindi 1995

Løgtingstíðindi 1995

Føroya løgting

Løgtingstíðindi 1995
© Føroya Løgting
Fyriskipað av løgtingsskrivstovuni
Umbróting og prenting: Dimmalætting
Innbinding: Helge Justinussen

INNIHALDSYVIRLIT

	Tingsetan 1995	15
	Tingnevndir	17
	Farloyvi	19
	Løgmansrøðan 1995	21
1	Broyting í løgtingslóg um ábyrgdargrunn	39
2	Broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap	40
3	Hernaðurmálið	45
4	Grannskoðan av almennum rokskapum	49
5	Tryggingarlóggávan	105
6	Europasáttmáli um fyribyrging av tortur i v.m.	146
7	Setan av nevnd at gera uppskot til nýggja kommunala skipan	147
8	Lóg um revsing fyri krígsbrotsverk í fyrrverandi Jugoslavia (Ikki framlagt)	155
9	Løgtingsfíggjarlóg 1996	155
10	Løgtingslóg um borgan fyri kommunulánum og um umlegging av kommunulánum	212
11	Løgtingslóg um happadráttarloyvi til Útvarp Føroya	215
12	Broyting í lóg um viðurskifti í samband við barnsburð v.m.	217
13	Tingskipan Føroya Løgtings	221
14	Løgtingslóg um viðbót til ávísar pensionistar v.fl.	223
15	Broyting í løgtingslóg um skúlafyrisiting	224
16	Nýval av nevndum (Ikki framlagt)	226
17	Frískúlar og privatir grundskúlar v.m.	226
18	Broyting í løgtingslóg um ásetan av almannaveitingum	230
19	Broyting í løgtingslóg um samsýning og eftirløn løgtingsmanna	232
20	Broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap	235
21	Lóg um heildarveiting til Føroyar	241
22	Broyting í løgtingslóg um ferðslu	242
23	Løgtingslóg um lán til Arbeiðsloysistryggingina og Arbeiðsávísingina	244
24	Broyting í løgtingslóg um afturlatingartíðir fyri handlar	246
25	Viðvíkjandi rentum í samband við bankaskuldina	249
26	Eykafíggjarløgtingslóg 1995	251
27	Føroyar eitt valdømi	282
28	Løgtingslóg um endurrindan til ymiskar kommunur fyri ferjulegur	295
29	Broyting í løgtingslóg um Landsbanka Føroya	298
30	Nýval av nevndum	300
31	Løgtingsmál um broyting í skattalógini	301
32	Broytingar í tolllóggávuni v.m.	316
33	Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um útvarpsnevnd	320
34	Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjónvarp	321
35	Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt	323
36	Løgtingslóg um mánaðarligan minstaforvinning til skrásettar útróðrarmenn	327
37	Fyrivarni við gjalding av rentum av bankaskuldini	331
38	Løgtingslóg um ábyrgd landsstýrisins	332
39	Uppgerð av føroysku utanlandsskuldini	337
40	Broytingar í rúsdrekkalógini	342
41	Frágreiðing frá Tingmannaráði Útnorðurs	347
42	Broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap	348
43	Løgtingslóg um viðbót til ávísar pensiónistar v.fl.	350
44	Løgtingslóg um ábyrgd fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v.m. á goymslu	352
45	Løgtingslóg um sjónvarp (Ikki framlagt)	353
46	Løgtingslóg um stuðul til fdnaðartrolarar	354
47	Broyting í løgtingslóg um sjónvarp (Ikki framlagt)	355
48	Løgtingslóg um sjónvarp	355
49	Løgtingslóg um útvarp	360
50	Broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi	364

51 Broyting í løgtingslóg um toll 365
52 Broyting í løgtingslóg um hvalaveiðu 367
53 Uppskot til lóg um fíggingargrunnin frá 1992 368
54 Broyting í løgtingslóg um landsjørð 369
55 Løgtingslóg um endurstovnan av "Menningargrunni Ídnaðarins" 371
56 Broyting í løgtingslóg um javnstøðu millum kvinnur og menn 373
57 Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um frítíð við løn 375
58 Fólkatrygging 378
59 Løgtingslóg um likskoðan, likarpskurð og vevnaðarflutning v.m. 383
60 Broyting í løgtingslóg um útvarpsnevnd 391
61 Broyting í løgtingslóg um sjónvarp 392
62 Broytingar í ferðslulógini 393
63 Eftirgeving av ella gjaldskipan fyri skuld til landskassan 395
64 Broyting í ymiskum løgtingslógum um undervising 399
65 Broyting í løgtingslóg um skúlafyrisitting 404
66 Broyting í løgtingslóg um studentaskúlar v.m. 406
67 Broyting í løgtingslóg um skeið til hægri fyrireikingarprovtøku 408
68 Løgtingslóg um granskingarráð 409
69 Lóg um innsetaratryggingrum 413
70 Broyting í løgtingslóg um veklgjald á motorakførum v.m. 419
71 Broyting í løgtingslóg um toll 421
72 Broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald av motorakførum 424
73 Løgtingslóg um yvirtøku av ikki yvirtikna partinum av málsøkinum telegraf- og telefonmál og fyrireiking av løgtingslóg um nýggja telelóggávu 427
74 Broyting í løgtingslóg um flot til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir 429
75 Løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl. 431
76 Stuðul til politiskt virksemi og politiska upplýsing 436
77 Løgtingslóg um varðveiting av fjølbroyttum fiskiflota 440
78 Broyting í løgtingslóg um minstuløn, dagsstuðning og minstaforvinning 442
79 Løgtingslóg um stuðning til skipasmiðjur 444
80 Løgtingslóg um mánaðarminstuløn til fiskimannamenn 446
81 Endurgjaldsgrunnur alivinnunnar 449
82 Løgtingslóg um fløgustuðul til alivinnuna 451
83 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt 453
84 Løgtingslóg um stuðul til menning av fiskivinnu á landi 455
85 Løgtingslóg um arbeiðsumbvørvi 461
86 Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan 490
87 Broyting í løgtingslóg um ferðslu 491
88 Broyting í arvaavgjaldinum 493
89 Broyting í løgtingslóg um búskaparráð 495
90 Broyting í løgtingslóg um stuðul til nýggjar eimur 496
91 Broyting í løgtingslóg um gjald o.l. fyri innkrevjing av falnari skuld til landskassan 498
92 Broyting í lóg um tann europeiskan mannarettindasáttmálan 500
93 Løgtingslóg um avtøku av landskassagrunnum 502
94 Javnhjóðis skatting av hjúnum og støkum 506
95 Broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap 509
96 Broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap 515
97 Broyting í løgtingslóg um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m. 531
98 Broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn 532
99 Løgtingslóg um sosialar pensjónir o.a. 534
100 Fyrispurningar 648
101 Løgtingslóg um avgjald í samband við panting 570
102 Løgtingslóg um eykajáttanir fyri fíggjarárið 1996 582
103 Løgtingslóg um royndarskipan innan eldrarokt í Sandoynni 594
104 Løgtingslóg um Sjúkrahúsverk Føroya 598
105 Skattafrádráttur fyri partapening 605

106 Sjálvstøðug skatting av hjúnafelaga í privatum vinnufyrituøkum 607
107 Uppsøgn av avtalunum við danir 608
108 Broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap 611
109 Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan 616
110 Frádráttir í sjálvuppgávuni fyri gávur til vælgerandi endamál 618
111 Endurskoðan av nuvnalóggávuni 620
112 Miðvísur landbúnaðarpolitikkur í Føroyum – 5-10 ára ætlan í landbúnaðarøkinum 624
113 Broyting í løgtingslóg um tær kommunalu fíggjarætlanirnar, ásetan av kommunuskattaprosentinum, kommunalan kreppulánsgrunn v.m. 627
114 Framtíðarstøða Føroya 629
115 Løgtingslóg um sjónvarp 632
116 Løgtingslóg um útvarpsnevnd 634
117 Tingskipan Føroya Løgtings 635
118 Løgtingslóg um íløgustuðul til alivinnuna 646

100- **Fyrispurningar**
1 Fyrispurningur til Andrias Petersen, landsstýrismann, viðvíkjandi sjúkra- og læknaflutningunum millum Nólsoy og Tórshavn. (Bjarni Djurholm) 648
2 Fyrispurningur til Eilif Samuelsen, landsstýrismann, viðv. analfabetismu í Føroyum. (Óli Breckmann) 649
3 Fyrispurningur til Andrias Petersen, landsstýrismann í almannamálum, viðvíkjandi niðurskurði av landssjúkrahúsinum. (Jenis av Rana) 652
4 Fyrispurningur til Andrias Petersen, landsstýrismann, viðvíkjandi heimarøktini. (Rúna Sivertsen) 653
5 Fyrispurningur til Óla Jacobsen, landsstýrismann, viðvíkjandi stuðu fiski- og útróðrarmanna í samband við lógina um arbeiðsloysistrygging. (Tórður J. Niclasen) 654
6 Fyrispurningur til Andrias Petersen, landsstýrismann, viðv. framtíðini hjá Klaksvíkar sjúkrahúsi. (Rúna Sivertsen) 656
7 Fyrispurningur til Sámal Petur í Grund, landsstýrismann, viðv. Føroysku Altjóða Skipaskrásetingini. (Óli Breckmann) 657
8 Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann, viðv. almennum starvssetanum og tvingsilssølum. (Óli Breckmann) 659
9 Fyrispurningur til Aksel Nolsøe, landsstýrismann, viðv. fgildisseting av lógunum um vinnuframa. (Bjarni Djurholm og Óli Breckmann) 661
10 Fyrispurningur til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, skattaviðurskifti føroysku sjómanna. (T. Niclasen) 663
11 Fyrispurningur til Andrias Petersen, landsstýrismann, viðv. arbeiðsleysum og forsorgarstuðuli. (Kristian Magnussen) 666
12 Fyrispurningur til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, viðv. lýsingini av sínámillum petingarenslinum millum Føroyar og Danmark. (Bjarni Djurholm) 667
13 Fyrispurningur til Ivan Johannesen, landsstýrismann, viðv. fløgustuðuli til trolara sbr. løgtingslóg um stuðul til fiskiskallotan. (Jógvan á Lakjuni) 670
14 Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann, viðv. málinum um Norðurhav og Norðuratlantshav. (T. Ísakson) 671
15 Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann, viðv. viðkaðum samsarvi millum Føroyar og Ísland. (Óli Breckmann) 673
16 Fyrispurningur til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, viðv. mannagongd við innkrevjing av skatti. (Bjørn á Heygum) 675
17 Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann, viðv. samráðingum um tollsamgongu. (John Petersen) 680
18 Fyrispurningur til Sámal Petur í Grund, landsstýrismann, viðv. teksting av føroyskum SvF sendingum fyri deys. (Óli Breckmann) 682
19 Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann, viðv. marknaðaviðurskiftum Føroya uttanfyri ES. (Jenis av Rana) 684
20 Fyrispurningur til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, viðvíkjandi skattaviðurskiftum føroysku sjómanna. (Óli Breckmann) 685

21 Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann: Hvor verður føroyska luttøkan í komandi føroyskari oljuvinnu. (Bjarni Djurholm) 686

EVNISYVIRLIT
1995

Almannamál

12 Broyting í lóg um viðurskifti í samband við barnsburð v.m. 217
14 Løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl. 223
18 Broyting í løgtingslóg um áseta av almannaveitingum 230
43 Løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl. 350
58 Fólkaurygging 378
75 Løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldsfar v.fl. 431
98 Broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn 532
99 Løgtingslóg um sosialar pensjónir o.a. 534
103 Løgtingslóg um roynda rskipan innan eldrarokt í Sandoynni 594
104 Løgtingslóg um Sjúkrahúsverk Føroya 598
100-8 Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann, viðv. almennum starvssetanum og tvingsilssølum. (Óli Breckmann) 659

Arbeiðsmál

33 Løgtingslóg um lán til Arbeiðsloysistryggingina og Arbeiðsávísingina 244
56 Broyting í løgtingslóg um javnstoðu millum kvinnur og menn 373
57 Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um frítíð við lun 375
79 Løgtingslóg um studning til skipasmiðjur 444
85 Løgtingslóg um arbeiðsumhvørvi 461
97 Broyting í løgtingslóg um trygdargrun fyri avreiðingar og lønir v.m. 531
98 Broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn 532
100-11 Fyrispurningur til Andrias Petersen, landsstýrismann, viðv. arbeiðsleysum og forsorgarstuðli. (Kristian Magnussen) 666

Ferðavinnumál

74 Broyting í løgtingslóg um flot til øl, mineralvatn og fíknar leskidrykkir 429

Fiski- og onnur sjóvinna

2 Broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap 40
20 Broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap 235
36 Løgtingslóg um mánaðarligan minstaforvinning til skrásettar úrróðrarmenn 327
42 Broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap 348
46 Løgtingslóg um studul til ídnaðartrolara r 354
52 Broyting í løgtingslóg um hvalaveiðu 367
77 Løgtingslóg um varðveiting av fjølbroyttum fiskiflota 440
78 Broyting í løgtingslóg um minstuløn, dagsstuðning og minstaforvinning 442
79 Løgtingslóg um studning til skipasmiðjur 444
80 Løgtingslóg um mánaðarminstuløn til úrróðrarmenn 446
81 Endurgjaldsgrunnur alivinnunnar 449
82 Løgtingslóg um flogastuðul til alivinnuna 451
84 Løgtingslóg um stuðul til menning av fiskivinnu á landi 455
95 Broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap 509
96 Broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap 515
97 Broyting í løgtingslóg um trygdargrun fyri avreiðingar og lønir v.m. 531
108 Broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap 611
118 Løgtingslóg um flogastuðul til alivinnuna 646
100-7 Fyrispurningur til Sámal Petur í Grund, landsstýrismann, viðv. Føroyskur Altjóða Skipa

skrásetingini. (Óli Breckmann) 657
100-10 Fyrispurningur til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, skattaviðurskifti føroysku sjómanna. (T. Niclasen) 663
100-13 Fyrispurningur til Ivan Johannesen, landsstýrismann, viðv. fløgustuðuli til trolara sbr. løgtingslóg um stuðul til feskfiskaflotan. (Jógvan á Lakjuni) 670
100-14 Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann, viðv. málinum um Norðurtoy og Norðuratlantshav. (F. Ísakson) 671
100-20 Fyrispurningur til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, viðvíkjandi skattaviðurskiftum føroysku sjómanna. (Óli Breckmann) 685

Fíggjarmál

1 Broyting í løgtingslóg um ábyrgdargrunn 39
9 Løgtingsfíggjarlóg 1996 155
21 Lóg um heildarveiting til Føroyar 241
25 Viðvíkjandi rentum í sambond við bankaskuldina 249
26 Eykafíggjarløgtingslóg 1995 251
29 Broyting í løgtingslóg um Landsbanka Føroya 298
31 Løgtingsmál um broyting í skattalógini 301
37 Fyrivarni við gjalding av rentum av bankaskuldini 331
39 Uppgerð av føroysku utanlandsskuldini 337
50 Broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi 364
51 Broyting í løgtingslóg um toll 365
53 Uppskot til lóg um Fíggingargrunnin frá 1992 368
63 Eftirgeving av ella gjaldskipan fyri skuld til landskassan 395
69 Lóg um innsetaratryggdargrunn 413
70 Broyting í løgtingslóg um vektgjald á motorakførum v.m. 419
71 Broyting í løgtingslóg um toll 421
72 Broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald av motorakførum 424
83 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt 453
86 Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan 490
88 Broyting í arvaavgjaldinum 493
89 Broyting í løgtingslóg um húskaparráð 495
91 Broyting í løgtingslóg um gjøld o.l. fyri innkrevjing av fahnari skuld til landskassan 498
93 Løgtingslóg um avtøku av landskassagrunnum 502
94 Javnbjóðis skatting av hjúnum og støkum 506
101 Løgtingslóg um avgjøld í sambond við panting 579
102 Løgtingslóg um eykajáttanir fyri fíggjarárið 1996 582
105 Skattafrádráttur fyri partapening 605
106 Sjálvstøðug skatting av hjúnafelaga í privatum vinnufyritøkum 607
107 Uppsøgn av avtalunum við danir 608
109 Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan 616
110 Frádráttir í sjálvuppgávuni fyri gávur til vælgerandi endamál 618
100-10 Fyrispurningur til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, skattaviðurskiftum føroysku sjómanna. (T. Niclasen) 663
100-12 Fyrispurningur til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, viðv. lýsingini av sínámillum peningarenslinum millum Føroyar og Danmark. (Bjarni Djurholm) 667
100-16 Fyrispurningur til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, viðv. mannagongd við inn krevjing av skatti. (Bjørn á Heygum) 675
100-17 Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann, viðv. samráðingum um tollsamgongu. (John Petersen) 680
100-20 Fyrispurningur til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, viðvíkjandi skattaviðurskiftum føroysku sjómanna. (Óli Breckmann) 685

Fyrispurningar

100-1 Fyrispurningur til Andrias Petersen, landsstýrismann, viðvíkjandi sjúkra- og leknaflutningum millum Nólsoy og Tórshavn. (Bjarni Djurholm) 648

100-2 Fyrispurningur til Eilif Samuelsen, landsstýrismann, viðv. analfabetismu í Føroyum. (Óli Breckmann) 649
100-3 Fyrispurningur til Andrias Petersen, landsstýrismann í almannamálum, viðvíkjandi niðurskurði av landssjúkrahúsinum. (Jenis av Rana). 652
100-4 Fyrispurningur til Andrias Petersen, landsstýrismann, viðvíkjandi heimarøktini. (Rúna Sivertsen) 653
100-5 Fyrispurningur til Óla Jacobsen, landsstýrismann, viðvíkjandi støðu liski- og útróðrarmanna í samband við lógina um arbeiðsloysistrygging. (Tordur J. Niclasen) 654
100-6 Fyrispurningur til Andrias Petersen, landsstýrismann, viðv. framtíðini hjá Klaksvíkar sjúkrahúsi. (Rúna Sivertsen) 656
100-7 Fyrispurningur til Sámal Petur í Grund, landsstýrismann, viðv. Føroysku Altjóða Skipaskrásetingini. (Óli Breckmann). 657
100-8 Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann, viðv. almennum starvssetanum og tvingsilssølum. (Óli Breckmann) 659
100-9 Fyrispurningur til Aksel Nolsøe, landsstýrismann, viðv. ígildisseting av lógunum um vinnuframa. (Bjarni Djurholm og Óli Breckmann) 661
100-10 Fyrispurningur til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, skattaviðurskifti føroysku sjómanna. (T. Niclasen) 663
100-11 Fyrispurningur til Andrias Petersen, landsstýrismann, viðv. arbeiðsleysum og forsorgarstuðuli. (Kristian Magnussen) 666
100-12 Fyrispurningur til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, viðv. lýsingini av sínátuillum peningarenslinum millum Føroyar og Danmark. (Bjarni Djurholm) 667
100-13 Fyrispurningur til Ivan Johannesen, landsstýrismann, viðv. løgustuðuli til trolara sbr. løgtingslóg um stuðul til feskfiskaflotan. (Jógvan á Lakjuni) 670
100-14 Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann, viðv. málinum um Norðurhøv og Norðuratlantshav. (F. Ísakson) 671
100-15 Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann, viðv. víðkaðum samstarvi millum Føroyar og Ísland. (Óli Breckmann) 673
100-16 Fyrispurningur til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, viðv. mannagongd við innkrevjing av skatti. (Bjørn á Heygum) 675
100-17 Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann, viðv. samráðingum um toffsamgongu. (John Petersen) 680
100-18 Fyrispurningur til Sámal Petur í Grund, landsstýrismann, viðv. teksting av føroyskum SvF-sendingum fyri deyv. (Óli Breckmann) 682
100-19 Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann, viðv. marknaðarviðurskiftum Føroya uttanfyri ES. (Jenis av Rana) 684
100-20 Fyrispurningur til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, viðvíkjandi skattaviðurskiftum føroysku sjómanna. (Óli Breckmann). 685
100-21 Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann: Hvør verður føroyska luttøkan í komandi føroyskari oljuvinnu. (Bjarni Djurholm) 686

Grannskoðan

4 Grannskoðan av almennum rokuskapum 49
4-1 Rokuskapir Landskassans fyri árini 1989-91. 49
4-2 Rokuskapir hjá Apoteksverki Føroya fyri árini 1993-94. 72
4-3 Rokuskapir hjá Útvarpi Føroya fyri árini 1993-94. 78
4-4 Rokuskapir hjá Sjónvarpi Føroya fyri árini 1993-94. 82
4-5 Rokuskapir hjá Føroya Jarðargrunni fyri árini 1993 og 1994. 86
4-6 Rokuskapir hjá Vakstrarhúsgrunninum fyri árini 1993 og 1994. 91
4-7 Rokuskapir hjá Føroya Ídnaðargrunni fyri árini 1993 og 1994. 93
4-8 Rokuskapir hjá Menningargrunni Ídnaðarins fyri árini 1993 og 1994. 96
4-9 Rokuskapir hjá Strandferðsluni 1993 og 1994. 100

Heilsumál

59 Løgtingslóg um líkskoðan, líkuppskurð og vevnaðarflutning v.m. 383

104 Løgtingslóg um Sjúkrahúsverk Føroya 598
100-1 Fyrispurningur til Andrias Petersen, landsstýrismann, viðvíkjandi sjúkra- og leknaflutninginum millum Nólsoy og Tórshavn. (Bjarni Djurholm) 648

Hernaðarmál

3 Hernaðarmálið 45

Kommunumál

7 Setan av nevnd at gera uppskot til nýggja kommunala skipan. 147
10 Løgtingslóg um borgan fyri kommunulánum og um umlegging av kommunulánum 212
28 Løgtingslóg um endurrindan til ymiskar kommunur fyri ferjulegur 295
113 Broyting í løgtingslóg um tær kommunalu líggjarætlanirnar, ásetan av kommunuskattaprosentinum, kommunalan kreppulánsgrunn v.m. 627

Landbúnaðarmál

54 Broyting í løgtingslóg um landsjørð 369
112 Miðvísur landbúnaðarpolitikkur í Føroyum - 5 - 10 ára ætlan í landbúnaðarøkinum 624

Landsstýri

Løgmansrøðan 1995. 21
38 Løgtingslóg um ábyrgd landsstýrisins 332

Lán og lánsábyrgdir

44 Løgtingslóg um ábyrgd fyri lánum til fiskanjøl og lýsi v.m. á goymslu 352
46 Løgtingslóg um stuðul til fdnaðartrolarar 354

Lógamál

111 Endurskoðan av navnalóggávuni 620

Løgting

Tingsetan 1995. 15
Tingnevndir 17
Farloyvi 19
Løgmansrøðan 1995. 21
13 Tingskipan Føroya Løgtings. 221
19 Broyting í løgtingslóg um samsýning og eftirløn løgtingsmanna. 232
27 Føroyar eitt valdømi 282
76 Stuðul til politiskt virksemi og politiska upplýsing. 436
114 Framtíðarstøða Føroya 629
117 Tingskipan Føroya Løgtings. 635

Mentannarmál

15 Broyting í løgtingslóg um skúlafyrisiting. 224
17 Friskúlar og privatir grundskúlar v.m. 276
64 Broyting í ymiskum løgtingslóguum um undervísing 399
65 Broyting í løgtingslóg um skúlafyrisiting 404
66 Broyting í løgtingslóg um studentaskúlar v.m. 406
67 Broyting í løgtingslóg um skeið til hægri fyrireikingarprovtøku 408
68 Løgtingslóg um granskingarráð 409

Nevndir og álitsfólk

16 Nýval av nevndum (Ikki framlagt). 226
30 Nýval av nevndum 300

Norðurlandamál

41 Frágreiðing frá Tingnummarði Útnorðurs 347
100-15 Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann, viðv. viðkaðum samstarvi millum Føroyar og Ísland. (Óli Breckmann) 673

Rættarmál

22 Broyting í løgtingslóg um ferðslu 242
40 Broytingar í rúsdrekkalógini 342
56 Broyting í løgtingslóg um javnstøðu millum kvinnur og menn 373
62 Broytingar í ferðslulógini 393
87 Broyting í løgtingslóg um ferðslu 491
88 Broyting í arvaavgjaldinum 493
92 Broyting í lóg um tann europeiskan mannarættindasáttmálan 500
114 Framtíðarstøða Føroya 629

Samferðslumál

28 Løgtingslóg um endurrindan til ymiskar kommunur fyri ferjulegur 295

Samskiftismál

73 Løgtingslóg um yvirtøku av ikki yvirtikna partinum av málsøkinum telegraf- og telefonmál og fyrireiking av løgtingslóg um nýggja telelóggávu 427

Trygging

5 Tryggingarlóggávan 105

Umhvørvismál

74 Broyting í løgtingslóg um fløt til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir 429

Undirvísingarmál

15 Broyting í løgtingslóg um skúlafyrisiting 224
17 Friskúlar og privatir grundskúlar v.m. 226
64 Broyting í ymiskum løgtingslógum um undirvísing 399
65 Broyting í løgtingslóg um skúlafyrisiting 404
66 Broyting í løgtingslóg um studentaskúlar v.m. 406
67 Broyting í løgtingslóg um skeið til bægri fyrireiðingarprøvtøku 408
100-2 Fyrispurningur til Eilif Samuelsen, landsstýrismann, viðv. analfabetismu í Føroyum. (Óli Breckmann) 649

Utanríkismál

6 Europasáttmáli um fyribyrging av torturi v.m. 146
8 Lóg um revsing fyri krígsbrotsverk í fyrrverandi Jugoslavia (Ikki framlagt). 155
92 Broyting í lóg um tann europeiskan mannarættindasáttmálan 500
100-19 Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann, viðv. marknaðarviðurskiftum Føroya utanfyri ES. (Jenis av Rana) 684

Útvarp og sjónvarp

11 Løgtingslóg um happadráttarloyvi til Útvarp Føroya 215
33 Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um útvarpsnevnd 320
34 Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjónvarp 321
45 Løgtingslóg um sjónvarp (Ikki framlagt). 353
47 Broyting í løgtingslóg um sjónvarp (Ikki framlagt). 355
48 Løgtingslóg um sjónvarp 355
49 Løgtingslóg um útvarp 360
60 Broyting í løgtingslóg um útvarpsnevnd 391
61 Broyting í løgtingslóg um sjónvarp 392
115 Løgtingslóg um sjónvarp 652

116 Løgtingslóg um ítvarnsnevnd 634
100-18 Fyrispurningur til Sámal Petur í Grund, landsstýrismann, viðv. teksting av føroyskum SvF-sendingum fyri deyv. (Óli Breckmann) 682

Vinnumál

24 Broyting í løgtingslóg um afturlatingartiðir fyri handlar 246
55 Løgtingslóg um endurstovnan av "Menningargrunni Ídnaðarins" 371
90 Broyting í løgtingslóg um staðul til nýggjar vinnur 496
100-9 Fyrispurningur til Aksel Nolsøe, landsstýrismann, viðv. ígildisseting av lógunum um vinnuframa. (Bjarni Djurholm og Óli Breckmann) 661
100-21 Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann: Hvør verður føroyska lutøkan í komandi føroyskari oljuvinnu. (Bjarni Djurholm) 686

TINGSETAN 1995

Ár 1995, leygardagin 29. juli kl. 11,00 varð løgtingið sett. Tingformaðurin frá seinasta tingsetu Marita Petersen tók fyribils sætið sum formaður og las upp skriv, dagfest 14. juli 1995, har løgmaður stevnir løgtingsmonnum til tings ólavsøkudag. Fyribílsformaðurin vísti á § 10 í nýggju stýrisskipanarlógini, ið kom í gildi ólavsøkudag 1995, har lógarásetningin er, at løgtingssetan byrjar ólavsøkudag og lýsti tingsetuna 1995 at vera setta.

Tingmennirnir eru:

Norðoya valdømi:
Anfinn Kallsberg, Viðareiði, ff.,
Vilhelm Johannesen, Klaksvík, jv.,
Álvur Zachariasen, Klaksvík, sj.,
Heini O. Heinesen, Kunoy, tj.

Eysturoyar valdømi:
Kjartan I. Joensen, Leirvík, ff.,
Atli Hansen, Norðragøta, sb.,
Jógvan I. Olsen, Toftir, sb.,
Signar á Brúnni, Fuglafjørður, tj.,
Lasse Klein, Saltangará, krf.,
Karl Robert Johansen, Strendur, vmf.,
Tordur J. Niclasen, Eiði, mf.

Norðstreymoyar valdømi:
Maria Hansen, Vestmanna, sb.,
Jógvan Durhuus, Vestmanna, tj.

Suðurstreymoyar valdømi:
Óli Breckmann, Tórshavn, ff.,
Bjarni Djurholm, Tórshavn, ff.,
Bjørn á Heygum, Tórshavn, sb.,
Lisbeth L. Petersen, Tórshavn, sb.,
Finnbogi Arge, Tórshavn, sb.,
Marita Petersen, Tórshavn, jv.,
Helena Dam á Neystabø, Tórshavn, sj.,
Finnbogi Ísakson, Tórshavn, tj.,
Kristian Magnussen, Tórshavn, vmf.,
Jenis av Rana, Tórshavn, mf.

Vága valdømi:
Sune Jacobsen, Sørvágur, sb.,
Jørgen Niclasen, Sørvágur, ff.

Sandoyar valdømi:
Jógvan Adolf Johannessen, Skopun, jv.,
John Petersen, Skopun, ff.

Suðuroyar valdømi:
Jákup Joensen, Lopra, sb.,
Sverre Midjord, Tvøroyri, jv.,
Henrik Old, Vágur, jv.,
Ingeborg Vinther, Vágur, vmf.,
Jákup Olsen, Vágur, krf.

Løgtingsmennirnir handaðu formanninum váttan smb. § 98 í tingskipanini og § 7 í stýrisskipanarlógini.

Sambært § 82 í nýggju tingskipan Føroya Løgtings tilnevnir løgtingsins skrivstovustjóri fólk at skriva løgtingsins gerðabók.

Tilnevndu skrivararnir vóru Marius Rein og Eyðna Joensen.

Síðani fór fram val av formansskapi.

Lisbeth L. Petersen skeyt upp at velja Jógvan I. Olsen til formann og varð hetta samtykt við 31-0 atkvøðum.

Tilnevning av 1., 2. og 3. næstformanni:

1. næstformaður: Anfinn Kallsberg,
2. næstformaður: Marita Petersen,
3. næstformaður: Signar á Brúnni.

Løgtingsformaðurin tók nú setið og takkaði fyri álitið.

- - -

2. november varð vald serlig nevnd at viðgera løgtingsmál nr. 12/1995: Tingskipan Føroya Løgtings.

Vald vórðu:
Sune Jacobsen, Helena Dam á Neystabø, Anfinn Kallsberg, Finnbogi Ísakson,
Vilhelm Johannesen, Ingeborg Vinther, Tordur J. Niclasen og Lasse Klein.

7. november boðaði Finnbogi Arge, løgtingsmaður í skrivi frá, at hann tók seg úr tingbólki sambandsfloksins.

9. november boðaði Finnbogi Arge, løgtingsmaður í skrivi frá, at hann tók seg úr valbólki samgongunnar og stóð einsamallur á tingi.

22. november var fyrsti spurnatími á skránni. Løgtingsmenn settu løgmanni og landsstýrismonnum munnligar fyrispurningar, sum vórðu svaraðir á sama fundi.

5. desember 1995 boðaði Óli Jacobsen frá, at hann segði landsstýrissess sín frá sær og allur tók sæti á tingi.

19. mars boðaði formaðurin frá, at seinasti framløgudagur var 25. mars 1996 og at mál, sum skuldu leggjast fram, skuldu vera løgtingsskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 21. mars 1996, kl. 16[00].

11. apríl boðaði formaðurin frá, at freistin fyri at boða frá skrivligum fyrispurningum var 16. apríl 1996.

29. apríl boðaði formaðurin frá, at seinasti framløgudagur var 7. mai 1996.

TINGNEVNDIR

31. juli vórðu samb. §§ 24, 25 og 26 í tingskipanini løgtingsnevndirnar valdar.

Formaðurin boðaði frá, at tveir valbólkar vóru. Í øðrum Sambandsflokkurin, Javnaðarflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin og Verkamannafylkingin við 18 tingmonnum og í hinum Fólkaflokkurin, Tjóðveldisflokkurin, Kristiliga fólkaflokkurin, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokkur og Miðflokkurin við 14 tingmonnum.

Figgjarnevndin:

Finnbogi Arge, Álvur Zachariasen, Kristian Magnussen, Vilhelm Johannesen, Anfinn Kallsberg, Finnboyi Ísakson og Tórður J. Niclasen.

Uttanlandsnevndin:

Atli Hansen, Helena Dam á Neystabø, Ingeborg Vinther, Marita Petersen, Bjarni Djurholm, Jógvan Durhuus og Jenis av Rana.

Landsstýrismálanevndin:

Jákup Joensen, Jørgen Niclasen, Heini O. Heinesen.

Vinnunevndin:

Álvur Zachariasen, Jákup Joensen, Karl Robert Johansen, Henrik Old, John Petersen, Heini O. Heinesen og Jákup Olsen.

Trivnaðarnevndin:

Maria Hansen, Lisbeth L. Petersen, Kristian Magnussen, Sverre Midjord, Óli Breckmann, Jørgen Niclasen og Jákup Olsen.

Mentanarnevndin:

Sune Jacobsen, Maria Hansen, Jógvan Adolf Johannessen, Marita Petersen, Bjarni Djurholm, Signar á Brúnni og Jenis av Rana.

Rættarnevndin:

Bjørn á Heygum, Sune Jacobsen, Ingeborg Vinther, Sverre Midjord, Kjartan L. Joensen, Signar á Brúnni og Lasse Klein.

3. august 1995 fór fram val av 2 limum og 2 varalimum í **Norðurlanda Ráðið.**

Fastir limir:	**Varalimir:**
Marita Petersen	Henrik Old
Anfinn Kallsberg	Bjarni Djurholm

3. august 1995 fór somuleiðis fram val av 6 limum og 6 varalimum í **Tingmannaráð Útnorðurs.**

Fastir limir:

Lisbeth L. Petersen
John Petersen
Henrik Old
Signar á Brúnni
Helena Dam á Neystabø
Tordur J. Niclasen

Varalimir:

Maria Hansen
Jørgen Niclasen
J. A. Johannessen
Jógvan Durhuus
Álvur Zachariasen
Jenis av Rana

FARLOYVI

31. juli 1995 bað Vilhelm Johannesen um farloyvi vegna sjúku. Samtykt við 25-0 atkvøðum, at Mann Dahl Sørensen skuldi taka sætið á tingi.

22. sept. 1995 bað Henrik Old um farloyvi vegna burturferð í almennum erindum. Samtykt við 26-0-0 atkvøðum, at Mikkjal Sørensen skuldi taka sætið á tingi.

10. oktober 1995 bað Kjartan I. Joensen um farloyvi vegna burturferð í egnum erindum. Samtykt við 21-0-0 atkvøðum, at Jógvan á Lakjuni skuldi taka sætið á tingi.

10. oktober 1995 bað John Petersen um farloyvi vegna burturferð í egnum erindum. Eftir at valbrøvini fyri Sandoyar valdømi vóru kannað, varð við 25-0-0 atkvøðum samtykt, at Eydun Videro skuldi taka sætið á tingi.

10. oktober 1995 bað Jørgen Niclasen um farloyvi vegna burturferð í egnum erindum. Eftir at valbrøvini fyri Víga valdømi vóru kannað, varð við 25-1-0 atkvøðum samtykt, at Svend Åge Ellefsen skuldi taka sætið á tingi.

16. oktober 1995 bað Jákup Olsen um farloyvi vegna sjúku. Næstvaldi á listanum Reinhold Nielsen hevði í skrivi boðað frá, at hann var burturstaddur og eftir at valbrøvini fyri Suðuroyar valdømi vóru kannað, varð við 24-0-0 atkvøðum samtykt, at Leif Lisberg skuldi taka sætið á tingi.

24. oktober 1995 bað Anfinn Kallsberg um farloyvi vegna burturferð í almennum erindum. Eftir at valbrøvini fyri Norðoya valdømi vóru kannað, varð við 25-0-0 atkvøðum samtykt, at Rúna Sivertsen skuldi taka sætið á tingi.

2. november 1995 bað Óli Breckmann um farloyvi vegna burturferð í almennum erindum. Næstvaldi á listanum Birgir Danielsen hevði í skrivi boðað frá, at hann ikki kundi møta á tingi og eftir at valbrøvini fyri Suðurstreymoyar valdømi vóru kannað, varð við 22-0-0 atkvøðum samtykt, at Anfinn V. Hansen skuldi taka sætið á tingi.

5. desember 1995 bað Óli Jacobsen um farloyvi vegna burturferð í egnum erindum. Samtykt við 26-0-0 atkvøðum, at Karl Robert Johansen skuldi taka sætið á tingi.

12. desember 1995 bað Lisbeth L. Petersen um farloyvi vegna burturferð í egnum erindum. Samtykt við 18-0-0 atkvøðum, at Pauli Ellefsen skuldi taka sætið á tingi.

20. desember 1995 bað Helena Dam á Neystabø um farloyvi vegna burturferð í egnum erindum. Samtykt við 24-0-0 atkvøðum, at Ronald Poulsen skuldi taka sætið á tingi.

16. januar 1996 bað Tórður J. Niclasen um farloyvi vegna burturferð í egnum erindum. Samtykt við 23-0-0 atkvøðum, at Petur Jacobsen skuldi taka sætið á tingi.

10. april 1996 bað Lisbeth L. Petersen um farloyvi vegna burturferð í egnum erindum. Næstvaldi á listanum Pauli Ellefsen hevði í skrivi boðað frá, at hann ikki kundi møta á tingi og samtykt varð við 17-0-0 atkvøðum, at Kaj Leo Johannesen skuldi taka sætið á tingi.

16. april 1996 bað Óli Jacobsen um farloyvi vegna burturferð í egnum erindum. Samtykt við 20-0-0 atkvøðum, at Karl Robert Johansen skuldi taka sætið á tingi.

13. mai 1996 bað Bjarni Djurholm um farloyvi vegna burturferð í almennum erindum. Samtykt við 22-0-0 atkvøðum, at Birgir Danielsen skuldi taka sætið á tingi.

Eykamenn í tingsetuni 1995.

Birgir Danielsen	12. mars - 08. apríl 13. mai - 28. juli	3 mðr. & 4 vikur
Pauli Ellefsen	12. des. - 26. des.	15 dagar
Sv. Åge Ellefsen	10. okt. - 24. okt.	15 dagar
Anfinn V. Hansen	02. nov. - 21. nov.	20 dagar
Atli Hansen	29. juli 95 - 28. juli 96	12 mðr.
Petur Jacobsen	16. jan. - 06. febr.	21 dagar
Sune Jacobsen	29. juli 95 - 28. juli 96	12 mðr.
Kaj Leo Johannesen	10. apr. - 23. apr.	14 dagar
Karl Robert Johansen	29. juli - 31. des. 16. apr. - 29. apr.	5 mðr.& 16 dagar
Jógvan á Lakjuni	10. okt. - 28. juli	9 mðr.& 18 dagar
Leif Lisberg	17. okt. - 30. okt.	14 dagar
Sverre Midjurd	29. juli 95 - 28. juli 96	12 mðr.
Ronald Poulsen	20. des. - 03. jan.	15 dagar
Rúna Sivertsen	24. okt. - 21. nov.	29 dagar
Marny Dahl Sørensen	31. juli - 20. aug.	21 dagar
Mikkjal Sørensen	30. sep. - 27. okt.	28 dagar
Eydun Viderø	10. okt. - 24. okt.	15 dagar

LØGMANSRØÐAN 1995

Inngangur

Ólavsøkan í ár er við eitt vegamót í tingsøgu Føroya.

Higartil hevur løgmaður í kunngerð kallað tingið saman til ólavsøkutings. Nú er staðfest í nýggju stýrisskipanarlógini, at tingið verður sett ólavsøkudag, og hetta er sostatt síðsta ferð, at løgmaður hevur kallað tingið saman á ólavsøku.

Gamal siður er, at løgtingsmenn, landsstýrismenn og prestar fara í skrúðgongu úr løgtinginum í Havnar kirkju sum ein áminning um fyrstu kristniboðunina úti á Tinganesi. Hetta er nú ásett í nýggju stýrisskipanarlógini.

Somuleiðis er tað siður, at løgmaður ber fram røðu í tinginum á ólavsøku, har sagt verður frá støðuni og samfelagsligu gongdini, útlitunum og viðureiktunum í samfelagnum. Hesin siður er nú eisini ásettur í stýrisskipanarlógini.

Áðrenn farið verður undir sjálva løgmansrøðuna skal eg vísa á, at tað, ið munnliga verður framborið í dag, er ein samandrátur av tí frágreiðing og fylgiskjølum, sum eru býtt út í tinginum.

Politiska gongdin

Síðani á ólavsøku í fjør eru stórar broytingar farnar fram á politiska økinum. Nýggj samgonga varð skipað 15. september í fjør millum Sambandsflokkin, Javnaðarflokkin, Verkamannafylkingina og Sjálvstýrisflokkin.

Burðurin var lungur, stríltið gekst at skipa samgongu, ymiskir møguleikar vóru roynd, men hendan gjørdist samgongan, og eg eri sannførdur um, at sum umstøðurnar tá vóru, var hetta einasti veruleikakendi møguleikin.

Samgonguskjalið millum hesar fýrar flokkar setti í nýggja kós út í kortið við í arbeiðssetningi at føra landspolitikk og venda risastóru afturgongdini til framgongd.

Hóast politisku brotasjógvarnir til tíðir hava verið stórir, og hóast áralagið hjá samgongunni ikki altíð hevur verið sum í ólavsøkuróði, so hevur tað eydnast at vinna upp land, tí búskaparliga og samfelagsliga afturgongdin er nú vend til framgongd, sjálvt um talan enn ikki er um nóg skjóta og stóra framgongd. Men betri áralag er neyðugt, tí tørvandi áralag minkar um ferðina og sjógóðskuna, tað vóru teir gomlu greiðir um.

Ætli maer ikki at lýsa gongdina í samfelagnum, áðrenn henda samgonga tók við, hóast løgmansrøðan í fjør ongantíð varð viðgjørd á tingi, men bert tríva í nøkur mál.

Samfelagið undan hesi samgongu var so ruddiliga farið á búsapang. Úrslitið av seinasta vali vísti greitt, at sambandsflokkurin átti at taka við politisku leiðslu landsins. Saman við hinum samgonguflokkunum eru føkilig stig tikin til loysn av politisku avbjóðingunum, og eg skal heita á allar góðar krelfir um at standa saman í stríðnum fyri at fáa samfelag okkara aftur á beina kós.

Tað hurmar meg, at síðan samgongan tók við, hava løgtingsmenn nýtt nógva tíð og orku til farin mál, sum hava elvt til nýggjar trupulleikar, í staðin fyri at nýta orkuna til at loysa teir trupulleikar, vit longu vóru í.

Bankamálið er eitt gott dømi. Frá byrjan havi eg sjálvur tvíhildið um, at hetta er eitt felagsmál, og at tað eigur at verða loyst sum slíkt. Hóast tað eydnaðist at fáa henda spurning á dagsskránna undir samráðingunum við dansku stjórnina í november í fjør, fekk hetta sjónarmið ikki nóg dyppa undirtøku í fyrsta atlogu. Hetta gjørdi, at kravið um, at danir skulldu áttaka sær sín part av kostnaðinum av hesum felagsmáli, ikki varð sett fram við nóg nógvari styrki. Nú eru tíðetur útlit til, at røddir úr øllum føroyskum flokkum alment taka undir við hesum sjónarmiði.

Tað er neyðugt at skilja, at ikki sømir seg føroyskum politikarum at gera ósaklig álop á danir – ella føra fram ógrundaðar skuldsetingar fríðti teimum. Vit eiga á ongan hátt at krúpa undan ábyrgdini av okkara egnu mistokum. Tað er Føroya fólk, sum hevur valt føroyskar politikkarar at stýra landinum. Vit, sum hava fingið betta álit frá Føroyingum, eiga at vera á varðhaldi, og vit hava sostatt hovuðsábyrgdina av teimum avleiðingum, sum standast av vánaligari politiskari leiðslu.

Vit eiga at hava í huga, at danir vóru til reiðar at leggja einar fýra milliardir út fyri okkara mistøk – umframt tær tríggjar milliardirnar til bankabjargingina, sum danir eftir mátti bestu sannføring sjálvir eiga at gjalda meginpartin av.

Eisini má ein seta spurningin, um danir ikki longu er sloppnir undan hesi ábyrgd, tí undanfarin landsstýri og samgongur hava samráðst og skrivað undir skeivar avtalur.

Eitt annað týðandi mál er viðurskiftini við ES. Í dag ivast eingin í, at okkara handilsavtala við ES er ikki nóg góð. Slíkt nervar á ongan hátt ES; men tað kemur okkum sjálvum aftur um brekku.

Eisini her varð vístá tað neyðuga í konstruktivum politikki, sum krevst fyri at gera Føroyar kappingarførar við onnur lond. Tá tað snýr seg um viðurskiftini við ES, niega føroyskir politikarar fram um alt hava fyrimunirnar fyri fólk og samfelag okkara fyri eyga. Føroyskir politikarar hava ikki hugsað um fyrimunirnar fyri føroyska samfelagið og føroyska fólkið, tí um sonu tíð hevur høpurin av føroyingum av sínum eintingum búsett seg í ES-londum.

Vælvitandi, at nýggja stýrisskipanarlógin setur stór krav til løgting, landsstýri og umsiting, setti samgongan sær sum endamál at styrkja rættartryggleika, at skapa nýggj arbeiðspláss, at rokja fiskastovnarnar, at bøta um marknaðarviðurskifti sum heild, at fáa lønsemi aftur í vinnuna, at skapa nýggj arbeiðspláss, at lækka skattatrýstið, at bøta um trupulleikarnar hjá sethúsaeigarum v.m.

Ein stórur partur av hesum setningi er longu farin í gongd og verður nú lagaður til tær broytingar og krav, sum nýggja stýrisskipanin fører við sær. Hesar broytingar eru nærri umreddar undir hvørjum málsøki sær.

Stýrisskipanin

Stýrisskipannarlógin er eina staðfesting av gomlum siðum samstundis sum hon hevur viðfevnandi broytingar við sær.

Umframt stýrisskipanarlógina verður eisini nýggj tingskipan tikin í nýtslu. Broytingarnar fara sostatt fram bæði innantings, millum tingið og landsstýrið og í landsstýrinum.

Nýggja stýrisskipanarlógin fær gildi í tveimum stigum. Á ólavsøku í fjor var lógin samtykt og lýst, í ár er skilnaðurin millum løgting og landsstýri komin í gildi, og á ólavsøku næsta ár koma reglurnar um ráðharra-stýri í gildi.

Sostatt fáa løgting og landsstýri viðkaðar heimildir. Rætur og skyldur eru nú nærri tilskilaðar í lóg, og politiskt er ábyrgdin lógd. Tingarbeiðið verður nú betur skipað. Skilnaðurin millum samgongu og andstøðu er minkaður, nú ið mál er samtykt, um meirihluti ikki er fyrir.

Nýggja stýrisskipanin er við til at byggja brúgv millum samgongu og andstøðu í løgtinginum, meðan løgting og landsstýri eru skilað sundur. Somuleiðis er javnvág nú millum løgting og landsstýri. Løgtingið kann nú til eina og hvørja tíð seta fram mísálit á landsstýrið, og fólnaður harafturímóti kann skriva út nýval, nær tað skal vera, uttan løgtingsins samtykki.

Nýggja stýrisskipanin setur stór krav til hvønn landsstýrismann, sum næsta ár skal taka fulla ábyrgd av sínum málsøki.

Hetta setur eisini stór krav til umsitingina, og hesum er eisini byggt upp fyri í samgongugrundlinum. Her er ísett, at serlivðingar skulu kanna út í ætsir allan almenna sektorin, og at umsitingin verður lagað til broyt-

ingarnar í nýggju stýrisskipanarlógini og styrkt m.a. við atliti at bøta um rættartrygdina.

Fyrireikingarnar til ráðharrastýri eru longu byrjaðar, og stjóri er settur at standa fyri at umskipa umsitingina til ráðharrastýri.

Samvinna við donsku stjórnina

Felagslýsingin millum landsstýrið og donsku stjórnina 17. november í fjør var eitt stórt framstig sammett við avtalurnar frammanundan. Fyri fyrstu ferð hevði avtalan skap sum felagslýsing millum javnbjóðis partar heldur enn aftur ein treytað avtala fyri at fáa landskassalánini endurfíggjað.

Fyri tað næsta er felagslýsingin soleiðis háttað, at tær treytir føroyingar binda seg til at ganga undir, mest eru til fyrimuns fyri okkum at endurreisa búskapin her á landi og fáa tað, sum fór skeivt í áttatiárunum, aftur á beint.

Høvuðspanarnir í felagslýsingini eru, at landsstýrið fær tilsøgn um endurfígging av teimum lánum, sum falla til gjaldingar við 6 ára standandi lánum til somu treytir, sum danska stjórnin sjálv fær. Eisini er danska stjórnin sinnað at stuðla ætlanum at varðveita arbeiðspláss ella skipa nýggj.

Felagslýsingin tryggjar sær, at ein ábyrgdarfullur fíggjar- og fiskivinnupolitikkur verður førdur. Í fíggjarpolitikkinum verður lagdur dentur á at avmarka undirskotini á fíggjarlógini og at fremja bygnaðarbroytingar í almennu fyrisitingini.

Fiskivinnupolitikkurin má byggjast á vísindaliga grundaðar skipanir, sum loyva fiskastovnunum aftur at vaksa upp á eitt støði, sum tryggjar, at tann óvissa, sum altíð verður í fiskiveiðu, verður so lítil sum møguligt.

Somuleiðis koma nú føroyskar vinnufyritøkur undir fleiri vinnustuðulsskipanir. Lunnar vórðu lagdir undir Framtaksgrunnin, sum uttan iva verður eitt týðandi amboð at varðveita og útvega nýggj arbeiðspláss í Føroyum.

Áhugin hjá donsku stjórnini fyri eini oljuvinnu og hjá donskum fyritøkum at vera við, eru tær kappingarførar, kemur eisini fram í avtaluni. Hesir møguleikar styrkja støðu Føroya munandi í samráðingum við Danmark.

Til samráðingarnar seinasta ár gjørdi landsstýrið greitt, at danir áttu fíggjarligu ábyrgdina av tí partinum av skuldini, sum viðvíkur endurfíggingini av bankunum, sum greitt er eitt felagsmál. Danir vóru tó ikki til reiðar til betta í fjør.

Næsta samráðingarumfarið í september verður nú fyrireikað. Avtalan millum Føroyar og Danmark fer at halda fram sum ein javnbjóðis avtala, sum leggur dent á at lætta um búskaparliga trýstið á borgaran.

Umráðandi fyri at fáa eitt gott samráðingarúrslit í september er, at politisk semja – og helst so breið sum møguligt – fæst á løgtingi um ein ábyrgdarfullan fíggjar- og fiskivinnupolitikk. Fæst ikki semja, verður ógvuliga torført at betra avtalurnar og vinna álit í útheiminum, sum møguliga kundi keypt føroysk lánsbrøv.

Ákæran um, at vinnulívið í Føroyum er týnt eftir einari danskari meginætlan, er burturvið. Hetta verður serliga ført fram av ávísum pørtum av vinnulívinum, sum hevur verið gjøgnum tyngjandi trotabúarviðgerð ella skuldarsaneringar.

Veruleikin er, at eitt ógvisligt upptak mátti fremjast frá umleið 1990 og frameftir. Tað var eyðsæð, at føroyskir politiskir myndugleikar ikki megnaðu hetta upptak, og tí noyddust ríkismyndugleikarnir at unthugsa, hvat ið gerast skuldi.

Danska umsitingin er vælskipað, einki verður gjørt uttan at tað er væl fyrireikað á embætismanna og politiskum stigi. Føroysku megin var lítið og einki fyrireikað. Tí sær tað út sum um danir hovdu eina ætlan, men vit onga, um hvat mátti gerast í ógvusligu búskaparkreppuni, sum tók seg upp í 1990.

Tað merkir tó ikki, at danskir myndugleikar ikki kunnu hava sínt serligu áhugamál at røkja ella gera mistøk. Í so máta eru teir neyvan øðrvísi enn vit. Tað er greitt komið fram, at danskir myndugleikar vilja heldur enn fegnir, at føroyskir myndugleikar sjálvir taka ábyrgdina av førda politikkinum.

Viðurskiftini Føroya og Danmarkar millum seinastu tíðina hava verið heldur spent. Uppruddingararbeiðið allan á áttatiárini, t.d. avtalan um kanning av hankamálinum, hevur tarnað og seinkað tí náttúrligu samsláttarlinum, sum má vera við tonsku stjórnina.

Eitt orsøk til hesi viðurskifti er helst tann, at føroyskir politikarar, føroyska umsitingin og føroyingar sum heild eru vel kunnaðir um donsk viðurskifti. Í tafarfuríni hevur tað ofta vístseg, at danskir myndugleikar mangan hava verið ov lítið kunnaðir um føroysk viðurskifti.

Landsstýrið setti sær fyri at bøta um hetta. Tað tykist sum um danir sjálvir eru varugir við hetta, og tað sæst aftur í teimum nógvu almennu vitjanunum úr Danmark seinasta áriið. Forsætismálaráðharrin Poul Nyrup Rasmussen var her í oktober í fjør, síðani komu uttanríkisráðharrin Niels Helveg Petersen, løgmálaráðharrin Bjørn Westh, búskaparmálaráðharrin Marianne Jelved, formannskapur Fólkatingsins og síðst og ikki minst Margreta drotning. Tað er at vóna, at hesar viljanir fara at bera ávøkst til gagns fyri fatanina landanna millum.

Eg fari nú í stuttum at viðgera tey málsøki, sum eru tilevnað av teimum einstøku landsstýrismonnunum, og sum eru lýst í frágreiðingini og fylgiskjølunum.

Fíggjar- og búskaparmál

Føroyski búskapurin er nú í framgongd, og hóast tað ikki beinleiðis ber til at lesa um stóra framgongd, so hevur hann stabiliserað seg.

Hetta hevur havt við sær, at búskapurin er blivin tryggari. Fólkaflytingin er av sama orsøk minkað, hóast nýtslan og virksemið eru vaksin nakað.

Lønarútgjaldingarnar fyrra hálvár í ár vóru 2% hægri enn fyrra hálvár í 1994. Myndin er munandi broytt, tí nú hava flestu vinnugreinir framgongd.

Tað er fyrst og fremst innan fiskiskap, at vøksturin munar. Lønarútgjaldingarnar í fiskivinnuni eru 23 mió. kr. ella 10% hægri enn sama tíðarskeið í fjør. Men eisini í øðrum vinnum er ávístur vøkstur, eitt nú skipasmiðjur (+20%), framleiðsla annars (+70%), bygging (+3%), gistihús (+9%5), sjóflutningur (+4%), flutningur annars (+8%), vinnulígar tænastur (+11%). Verulig minking sæst mest innan fígging og trygging.

At virksemið er vaksið sæst aftur í innflutninginum, ið hækkaði umleið 13% tíðarskeiðið januar-apríl í ár í mun til sama tíðarskeið í fjør. Meira byggivirkir, maskinur og onnur útgerð verða innflutt; men bólkurin "til aðra framleiðslu", sum annars vaks í innflutningi til mars í ár, hevur 7% í aftur gongd, tá ið talini fyri apríl verða tald við.

Innflutningurin av nýtsluvørum er vaksin góð 15%, og tað bendir á eitt ávíst álit á framtíðina. Tað sama kann sigast um innflutning av bilum (+435%). Stóra avgjaldslækkingin, í fraud varð í vár, hevur sjálvandi havt stóra ávirkan, men innflutningurin tykist halda seg rætttíliga høgt, umr. 6-8 mió. kr. um mánaðin.

Innflutningurin fyrra hálvár í ár verður umleið 825 mió. kr. móti vegis 727 mió. kr. fyrra hálvár 1994.

Útflutningurin fyri jan.-juni er minkaður nukað sammett við í fjør. Frá 982 mió. kr. til 924 mió. kr. Fallið stendst fyrst og fremst av, at útflutningurin av rækjum fall úr 142 mió. kr. niður í 91 mió. kr. og av ísaðum laksi úr 158 mió. kr. niður í 97 mió. kr. Tað verður tó mett, at falli í laksaútflutninginum ikki verður so stórt, sum fyrra hálvár gevur ábendingar um.

Í útflutninginum hevur í høvuðsheitum lítil og engin vøkstur verið í prísunum samanborið við lágu prísirnar í 1994.

Handilsjavnin fer væntandi at hava knappar 4000 mió. kr. í avlopi í ár. Innflutningurin vaks umleið 100 mió. kr. meðan útflutningurin versnaði 58 mió. kr. Roknað um til ult árið, so versnar handilsjavnin úr 500 mió. kr. niður í 200 mió. kr. Roknast kann við, at laksaútflutningurin seinna hálvár er undirmettur, so tá avtornar verður avlopið á handilsjavnanum helst 300-400 mió. kr.

Gjaldsjavnin fyri 1994 fekk eitt sera stórt avlop, eina góða milliard, hóast handilsjavnin versnaði knappar 200 mió. kr. í mun til 1993. Orsøkin er ein bati í teim sonevndu óskrásetiligu postunum, fyrst og fremst í rentunum til útlandið, og helst eisini í útreiðslunum til ferðing uttanlands. Eisini ávirkar tað gjaldsjavnan, at fólk við stórari skuld flyta av landinum.

Torført er at meta um gjaldsjavnaavlopið fyri 1995; men neyvan fer tað niður um 500 mió. kr. Sum gongdin frá 1993 til 1994 er, so nýtist broytingin í gjaldsjavnanum ikki at fylgja broytingini í handilsjavnanum. Hinvegin er gjaldsjavnaavlopið í 1994 so mikið stórt, at ein illa kann hugsa sær, at viðurskiftini í 1995 kunnu elva til, at gjaldsjavnaavloðið í 1995 fer niður um 500 mió. kr.

Eftir nøkur ár við stórum halli á løgtingsfíggjarlógini sær tað núu út til, at tamarhald er fingið á støðuni, og at javnvág er í eygsjón.

Inntøkur landskassans hækka væntandi nakað. Serliga skattinntøkurnar fara óivað at geva góðar 50 mió. kr. meira enn mett. Útreiðslurnar standa við.

Landsstýrið hevur sett sær fyri at nútímansgera fíggjarstýringina við tí fyri eyga, at meira fæst burtur úr avmarkaðu peningamøgdini í landskassanum. Nýggja stýrisskipanarlógin setir stór krøv til tann einstaka landsstýrismannin, sum fortnliga fær fulla ábyrgd av og ræði á játtanunum fyri sínu málsøki.

Arbeiðið verður skipað í tveimum pørtum. Í fyrra parti verður farið yvir til nýggja játtanarskipan v.m. og seinni partur verður at nútímansgeera og tillaga edv-skipanina til krøvini.

Við nýggju játtanarskipanini verður farið til meginreglurnar í tí skipan, sum verður nýtt í Danmark viðvíkjandi uppseting av fíggjarlóg, krøvum til lýsing og átgreinan av játtanum. Neyvar reglur verða gjørdar fyri heimildir og skyldur hjá fyrisitingini í sambandi við umsiting av játtanum.

Tann nýggja játtanarskipanin fer at geva løgtinginum eitt gott grundarlag fyri eftirliti við, um fyrisitingin virkar sambært teimum avgerðum, sum liggja aftan fyri samtykta fíggjarlógina, eins og ábyrgd kann betur staðfestast. Longu nú verða gjørdar broytingar til fíggjarlógina m.a. at bólka rakstrarstøð og seta upp meira einsháttaði fylgiskjøl. Vónandi er alt fingið frá hondini í 1997.

Av teimum lógarbroytingum og lógum, umfamt tær av tekniskum og umsitingarligum slagi, sum eru samtyktar síðan sitandi landsstýrið tók við, kunnu m.a. nevnast:

- frádráttarin hjá pensjónistum hækkaður
- marginalskatturin lækkaður
- ferðafrádráttarin í gildi aftur í broyttum líki
- fíggjarognaravgjaldið lækkaði úr 1,9% til 0,65%
- rentuskatturin hækkaði úr 22% til 35%
- frádráttur fyri viðlíkahald av egnum húsum og egnum akfari
- partafelagsskatturin hækkaði úr 22% upp í 27%
- skrásetingargjaldið av akførum lækkaði
- frádráttarrætturin fyri nýggj veðhald fellur burtur
- innkrevjingin av mvg-eftirstøðum styrkt
- retnufrádráttarin hækkaður

Av ætlaðum lógarbroytingum og lógum, sum væntandi verða lagdar fram í hesi tingsetu, kunnu m.a. nevnast:

- frádrátturin hjá pensjónistum lækkast
- telefonfrádrátturin hjá langfarafiskimonnum
- frígoymslur/fríhavnir
- hjúnabandsstøðan oonga skattliga ávirkan
- skattalógin gerast einfaldari
- kumulativa skattaskipanin endurskoðað
- styrktan kærustovn í skattamálum evt. samskipan

Lánsskuld landskassan var í 1988 490 mió. kr. Í 1994 var skuldin 6.410 mió. kr. t.v.s. at eftir seks árum er skuldin vaksin nærum 6 milliardir. Gongdin avmyndar, at landskassin hevur yvirtikið privata skuld við veð bildsútleggum og kapitalinnskotum í bankaskipanina, men eisini stórt hall á leypandi rakstri landskassans.

Við verandi fortreytum kann landskassans skuld við árslok 1998 mest at fara at verða 7.110 mió. kr.

Landskassaskuldin, saman við aðrari almennari skuld, er so stór, at hon er ein stór avbjóðing til føroyskan búskapar og fíggjarpolitikk tey næstu árini.

Rentuútreiðslurnar, sum í 1988 vóru 47 mió. kr. vóru í 1994 467 mió. kr. verða væntandi 560 mió. kr. í 1998. Tær eru nú meira enn 20% á løgtingsfíggjarlógini.

Eftir avtaluni við donsku stjórnina verða landskassans lán uttan fyri Føroyar endurfíggjað við ríkislánum, sum eru avdráttarfrí í 6 ár frá tí, at endurfíggingarlánið verður upptikið. Hin fíggingartørvin, t.v.s. hallið á fíggjarlógini og endurfígging í Føroyum, skal landsstýrið útvega.

Landsbankin seldi í des. 1994 og jan. 1995 landskassalánsbrøv fyri 260 mió. kr. í navnavirði. Sølan gekk betur enn væntað. Við hesum varð prógvað, at tað ber til at fíggja ein tørv hjá landskassanum á henda hátt.

Endurfíggingaravtalan við donsku stjórnina og tann ferdi fíggjarpolitikkurin eftir at álvarsliga kreppan byrjaði, hava givið tað kredittvirði, sum var neyðugt, fyri at lántøka kundi koma í lag.

Landsstýrið rindar eina meirrentu fyri brevalánið, sammett við ríkislán við sonnu lánstíð. Tey fyrstu lánsbrøvini vórðu seld fyri 2,25% í meirrentu; men av tí at sølan gekk betur enn væntað, vórðu tey seinastu seld fyri 1,9% í meirrentu. Meirrentan er síðani lækkað til 1,72%.

Mett verður, at tað ber til at útvega tann neyðugu peningin til at nøkta fíggingartørvin í 1995 við lánsbrevasølu, men óivað við sonnu meirrentu, orsakað av avtalubygnaðinum. Tað, sum eftir er av árinum, skal seljast fyri einar 170 mió. kr. aftrat.

Nógvur peningur skal útvegast við lánsbrevasølu næstu árini. Seljast skulu fyri 2.400 mió. kr. til 1998. Stívar 400 mió. kr. til at endurfíggja gomul lán í Føroyum, umr. 400 mió. kr. til samanlagd hall á fíggjarlógini, um 300 mió. kr. í lánsveitingum til almennar grunnar til endurfígging av lánum og 1.300 mió. kr. til afturgjalding av lánsbrøvum, tí tey hava so stutta lánstíð.

Landsstýrið ásannar, at endurfíggingaravtalan við donsku stjórnina hevur bindingar. Her verður serliga hugsað um lánsbrevasøluna og møguleikarnar at lækka altan rentukostnaðin. Notat er sent donsku stjórnini, sum viðger hendan spurningin.

Føroya Banki er nú ein tryggur banki. Landsstýrið eigur stórri virði í fíggingargrunninum frá 1992, sum eigur Føroya Banka. Hesi virði fara, sum frá líður, at gerast sjónligari og at koma landskassanum og skattgjaldaranum til góðar.

Sparikassarnir hava verið sterkir í hesum krepputíðum, og hava saman við banka, Húsalánsgrunninum og landsstýrinum medvirkað til sethúsaloysnir fyri at lætta um hjá skuldartyngdum húsarhaldum.

Hagtøl vísa, at búskaparliga virksemið er komið á botn, og hevur í eina tíð hildið sær á einum lágum støði.

Eitt tryggur búskaparligur vøkstur kemur, tá ið fiskastovnarnir eru kommir so mikið fyri seg aftur, at teir kunnu geeva hægri veiðu, enn í dag.

Nógvar fyritøkur hava fingið skuld eftirgivna, og í nesum liggur ein nøguleiki fyri vøkstri, tá ið virkini aftur tora at seta pening av til viðlíkahald og íløgur.

Gjaldførið hjá peningastovnunum er sera gott. Um vígaflísur kapitalur er tøkur, so ber til at fíggja ein búskaparliga vøkstur.

Tryggingarnar hava megnað at staðið ímóti stóru búskaparligu afturgongdini. Tær hava verið fíggjarliga sterkar og hava dugað at lagað seg til fallandi inntøkur.

Tey komandi árini verða neyvan merkt av stórvegis framgongd, bóast tey stóru bakkøstini eru farin aftur um bak. Um livikorini í Føroyum skulu batna, og tað er neyðugt, má tað annaðhvørt koma frá nýggjum virksemi uttan fyri fiskivinnuna ella frá skattalætta, sum helst bert kann fáast til vega eftir samráðingarnar við donsku stjórnina í heyst.

Fiskivinna

Orðaskiftið um føroyska fiskivinnu er endað í tvídrátti um kvotur, handilsligar ella ikki, og um stovnsmetingar. Hetta dregur eygað frá tí veruliga spurninginum: Hvussu fáa vit skipað fiskiflota, virking og sølu soleiðis, at fiskivinna virkar undir marknaðarbúskaparligum treytum og vinnur nóg nógvan pening at svara hvørjum sítt, geva fólkinum í fiskivinnuni eina rímiliga útroku og trygg arbeiðspláss um alt landið.

Búskaparliga støðan í fiskivinnuni er vánalig. Størsta fiskasølan er júst endurskipað við nýggjum kapitali. Flakavirkisvinnan liggur sera tungt í sjónum, og heimaflotin yvirlivir bert við fløgustuðli og lønarstuðli til fiskimenn. Tað er veruleikin, sum politisk støða má takast til.

Útrokningarnar vísa í dag, at øktar kvotur ella veiða eru ikki nóg mikið at tryggja búskaparliga javnvág. Tá stovnarnir aftur eru kommir í eitt nøktandi støði, verða kvoturnar av toski, býsu, upsa og kongafiski væntandi uml. 100.000 tons. Kvotan, sum løgringið áseti fyri hesi fiskasløg í mai í ár er uml. 75.000 tons. Verða 100.000 tons frá teimum uppafturbygdu stovnunum býti eftir galdandi lóg til tey skip, sum eru í flotanum, og skipini annars fiska sum vant av ókvoteraðum fiskasløgum, so verður við galdandi prísum alt ov lítið í part hjá øllum skipaflotunum omanfyri 100 tons.

Av búskaparligum orsøkum verður tí, um talið av fiskiferum omanfyri 100 tons verður óbroytt, eitt trýst at økja kvoturnar meira enn stovnarnir tola.

Meinbogin hjá flakavirkisvinnuni er, at rakstraravlopið er einki ella alt ov lítið, so meira rávara loysir neyvan grundleggjandi trupulleikar.

Sostatt má orðaskiftið hendast burtur frá, hvussu stórar kvoturnar skulu vera í upphyggingartíðini til at snúgva seg um, hvussu veiði- og virkingarorka skulu laga seeg til rávarutilfeingið, tá stovnarnir eru bygdir uppaftur.

Fiskiveiði
Bygnaðarnevndin, sum hevði umboð úr umsitingini og vinnuni, skeyt upp egnar handilskvotur, tí hon sá, at semja fekst ikki í lag í vinnuni ella politiskt, hvussu fiskiflotin kundi liva av tilfeinginum undir Føroyum.

Tí vísti nevndin á, at lata búskapin avgera rætta javnvágina millum tilfeingi og fiskiflota. Í tíðarskeiðinum við lágum kvotum, har stovnarnir kundu vaksa aftur, 1994-1998, skuldi fløgustuðulin vurðverdast, síðani skuldi flotin hvíla í sær sjálvum.

Hóast nevndin ikki vildi úttala seg um, hvussu stórur flotin skuldi vera, so var greitt út frá teimum útrokningum, sum vóru í frágreiðingini, at flotin mátti tillaga seg í stóruni.

Seinni er spurnatekin sett við, um fríur handil við kvotum loysir trupulleikarnar, so sum fiskivinnan er fyri. Búskaparliga sæð er eingin ivi um, at handilskvotur er ein góður háttur at laga fiskiflotan til tilfeingið. Kvotuskipanin gevur nýtslurættin til tær eindir, sum eern best riknar og kasta mest av sær. Hetta krevur, at frávikini frá vanligum marknaðartreytum í fiskivinnuni sum heild eru ikki ov stór.

Tað er eyðsæð, at føroyska virkisliðið og søluliðið sum nú er virka ikki undir vanligum marknaðarbúskaparligum viðurskiftum. Serliga hevur verið víst á prísásetingina á fiski. Har er tað enn so, at rúgva ofta vinnur á dygd, ið hvussu so er fær dygdin ikki tann eykavinning, sum ein vælvirkandi marknaðarskipan átti at borið í sær. Sostatt kundu frítt sølubarar kvotur ført við sær, at rúgvuhugsanin stóð við.

Vísindaliga grundað MLV skal tryggja, at stovnarnir kundu byggjast uppaftur. Tá teir eru komnir í eina góða legu skal úrtøkan vera burðardygg. Vinnan harafturímóti heldur, at stovnarnir kunnu røkjast við tekniskum reguleringum uttan MLV og kvotur. Serliga hevur veriðð víst á eina vælgrundaða kassaskipan. Broytta gongdin hjá toski í ár sýnir tó avmarkingarnar í kassaskipanum.

Er MLV ásett, so mugu kvotur setast á og tá verður støðan skjótt tann, at so mugu kvoturnar eisini vera egnar og kunnu keypast og seljast. Hetta kom greitt fram í tilmælunum frá § 2 nevndini. Eingin ivi er tó um, at kvotaskipanin verður nógv lættari at umsita, um fiskiflotin er meira tillagaður. Tí ber til at umhugsa at eitt ovara mark fyri fiskiflotanum - út frá búskaparligum grundum - verður ásett politiskt. Hetta er í roynd og veru gjørt bæði í lóg um stuðul til feskfiskaflotan fyri øll fiskifør omanfyri 20 tons og í lóg um vinnuligan fiskiskap fyri skip oman fyri 100 tons. Politiska málið átti at verið, at skip, sum ikki bera seg rakstrarliga, áttu at fækkast.

Almenni stuðulin til fiskivinnuna má leggjast um, so at allir tættir, sum stuðla ovurorku, verða tiknir burtur og bert teir, sum eru verulig inntøkutrygd og sum stuðla mennning og nýskapan, verða varðveittir. Tí má lógarverkið viðvíkjandi rakstrar- og lønarstuðli til fiskivinnuna, herundir inntøkutrygdarlógirnar verða eftirkannað. Taðð kann føra við sær, at nøkur fiskifør bera seg ikki við ongum stuðli.

Verandi skipan av fiskiveiðuni gevur vinnuni stórar trupulleikar. Er politiskur vilji fyri, at MLV skal ásetast og hareftir kvotur, so er neyðugt, at vinnan og tey, sum eiga vinnutólini og fíggjarstovnarnir, verða spurd í samband við lógarbroytigarnar. Tað slepst tó ikki undan at staðfesta, at trupulleikarnir einamest stava frá, at ein ov stórur floti skal liva av avmarkaðum kvotum.

Lógaruppskot um kvotur fyri komandi kvotuár verður í dag lagt fyri tingið. Dentur er lagdur á at tryggja, at gýtingarstovnarin veksur aftur, so óvissan, sum altíð verður í fiskiskapi, verður so lítil sum gjørligt.

Vit hava verið so heppin, at náttúran seinastu tvey árini hevur veriðð okkum til vildar, nú tilgongdin av toski og hýsu, sum krevst fyri at stovnarnir kunnu vaksa, er økt. Náttúran hevur gjørt sítt og nú er takið, at vit politikarar gera okkara á skilagóðan hátt, soleiðis at stovnarnir kunnu vaksa og veiðan kemur í trygga legu.

Landsstýrið leggur dent á at varðveita sínámillum fiskiveiðuna á sama støði og vit eru við í royndunum at skipa fiskiskapin uttan fyri 200 fjórðingar, og royndir at menna møguleikarnar á hesum leiðum eru stuðlaðar.

Hesi tiltøk eiga at verða fram beinanvegin:

- at skipa eitt vælvirkandi fiskiveiðieftirlit, sum samtykt í løgtinginum og at fáa so væl undirbygdar stovnsmetingar sum gjørligt,
- at fáa eitt nýtt tilmæli frá serfrøðingum um, hvussu vit við broytingum í lóg um vinnuliga fiskivinnu tryggja karmarnar fyri at laga veiðiflotan til tilfeingið við at avseta størri part til egnar kvotur, so lættari verður at skifta um kvotur sínámillum. Úrslitið verður sent vinnunni til ummælis. Uppskot til lógarbroytingar verður lagt fram mánaðarskiftið august-september,
- lógargrundarlagið fyri minstuløn v.m. verður kannað í samband við ta frágreiðing, sum lutast skal donsku stjórnini í september, og úrslitið verður sent vinnuni til ummælis, og
- at økja samstarvið við grannatjóðirnar í Norðuratlantshavi at fáa skipað viðurskifti á víðum havi, serliga eftir kongafiski og norðhavssild og tryggja okkum okkara rættvísa part av hesum stovnum.

Fiskivinna á landi

Rakstrarúrslitini hjá virkisliðinum eru sera vánalig. Vón er um at fáa meira virksemi bygt á botnfiskastuvnarnar undir Føroyum, so hvørt toska- og hýsustovnarnir eru bygdir upp aftur á eitt hóskandi støði. Møguleiki er eisini onnur rávøra, antin alternativ fiskasløg, innfluttur fiskur ella onnur rávøra, nýggj veiða sum t.d. kongafiskurin í Irmingarhavinum ella uppisjóvafiskasløg.

Nógv arbeiði er gjørt at kanna nýggjar møguleikar, og eg skal seinni koma aftur til tann vinnuframapolitikk, sum landsstýrið hevur lagt til rættis, serliga at stuðla nýggjum vinnum. Trupulleikin tykist vera, at ringt er hjá teimum, sum vilja fara undir nýtt virksemi, at finna veg í møguleikunum sum eru og at fáa greinað verkætlanir, sum saman við almenna stuðlinum kann útvega egin- og bankafígging.

Landsstýrið fer at gera tað lettari at útvega sær tilfar um ta vitan, vit hava, at leggja dent á at stuðla royndum at virku størri part av fiski okkara. Størsta ikastið kann gerast norðhavssildin, sum mennir seg skjótt, og sum kom í stinum í føroyskan sjógv í maj-juni. Av óvissu støðduni um býtið av sildini fekk nótaflotin ikki lagt fiskiskapin so til rættis, at tað loysti seg at virka sildina til matna. Størri dentur verður lagdur á at stuðla royndum at fáa meira burtur úr besum møguleika náttúran hevur borið okkum. Sildin og onnur alternativ og oppisjvar fiskasløg geva møguleikar fyri at fáa virksemi í gongd um landið, tsm kann geva okkum nýggj arbeiðspláss, sum okkum tørvar so dyggiliga.

Landsstýrið hevur tí sett í gongd útgreining av møguleikunum at gagnnýta norðhavssildina til matna og tilíka nýtslu. ið ber í sær arbeiðskrevjandi handfaring og viðgerð. Hendu útgreining og uppskot um, hvørjir tættir tørva nærri kanning, og møguleikarnir fyri at veita byrjunarstuðul, verða skjótt liðug.

Tað hevur stóran týdning, at vinnuvirki okkara standa seg í góðsku í kappingini við onnur lond og kunnu møta krøvunum frá teimum, vit selja til. Vinnan hevur ábyrgdina av, at bon týkur krøvini, ið innaneftirlitið setur. Almenna myndugleikarnir skulu stuðla tilevningini av innaneftirlitsskipanum, góðkenna tær og hava eftirlit við, at tær verða fylgdar. Dentur verður lagdur á at fremja hesa skipan, so vit í minsta lagi eru ájavnt við okkara kappingarneytar og helst fremri, tá tað ræður um góðsku.

Sjóvinna

Sjómannslógin frá 1988 eigur at verða endurskoðað. Arbeitt verður við at frá 1. januar 1996 skulu allir sjómenn verða leknakannaðir annaðhvørt ár, og reglur verða gjørdar fyri heilsutænastuna hjá sjómonnum. Bøtt verður eisini um arbeiðsumhvørvið umborð á landils- og fiskiskipum. FAS-skipanin er broytt og betrað, so fyrimunirnir við henni verða størri.

Allvinna

Bygnaðurin í alivinnuni er nógv broyttur seinastu árini og er í tøttum samstarvi við vinnuna og fíggingarstovnar lagaður til tær fortreytir, sum eru í náttúruni við verandi tøkni. Hetta hevur bøtt um rakstur, minka um felli av sjúku og umhvørvi og givið eina sunnari vinnu.

Trý tey seinastu árini, 1993-95, hevur smoltframleiðslan fingið stuðul, og lógin fer úr gildi nú. Havbúnaðarfelagið hevur latið landsstýrinum tilfar um kappingarstøðuna hjá alivinnuni, sum verður viðgjørt í sambond við komandi fíggjarlóg. Ætlanin er at leggja lógaruppskot fyri tingið um endurgjald fyri felli í alibrúkum, sum tað almenna og vinnan fíggja í felag.

Nýggja kynsbótarstøðin í Skopun gevur vónandi møguleikar at økja um kappingarførið í alivinnuni. P/f Fiskaaling er umskipað sum sjálvstøðugt partafelag. Fiskaaling, saman við øðrum tænastum, sum landskassin fíggjar, er týðandi partur av tí karmi, alivinnan hevur at virka undir.

Vinnuframi

Landsstýrið setti í heyst nevnd at arbeiða við arbeiðsskipanarliðtøkum. Nevndinn lýsir tær skipanir, sum vóru í gildi og tær ábøtur, sum vóru áttroðkandi, og skeyt upp nýggjar skipanir at bøta um møguleikan fyri nýggjum vinnum og útvega fleiri arbeiðspláss. Landsstýrið hevur síðani fingið neyðugu lógar- og reglugrundarlagið til fleiri skipanir. Hetta hevur tikið tíð, men grundarlagið er nú lagt.

Føroysk virki eru smá og hava lítla orku at finna upplýsingar, møguleikar og nýta nógva orku til atgreina verkætlanir. Hetta er tó neyðugt skal skil vera í. Heimild er nú útvegað til ráðgevahjálp og at lýsa hvørjir møguleikar eru og hvør vitan er tøk hjá vinnulívinum.

Nógvar stuðulsskipanir eru tøkar at stuðla royndum at koma í gongd. Summar eru danskar, sum føroyingar hava atgongd til, aðrar føroyskar. Nevndir taka endaliga avvgerð, hvør verkætlan fær stuðul. Hjá teimum, sum ætla sær undir nýggj tiltøk, kann vera ringt at vita, hvør skipan bóskar til teirra.

Landsstýrið ætlar tí at samskipa umsitingina av ymisku skipanunum á einum stað, sum skal leiðbeina og málsviðgera umsóknir fyri tær ymisku nevndirnar. Teir nógvu møguleikarnir fara at gagna vinnulívinum og tryggja eina góða málsviðgerð av umsóknunum, óansæð stuðulsskipan.

Á nógvum vinnuligum økjum tykist so smátt vend vera komin í, ella ið hvussu so er tann broyting, at tað ikki nyttar at bíða eftir, at okkurt hendir.

Eitt ítøkiligt dømi um hetta er, at 15 fyritøkur bjóðaðu seg fram á Fishing '95 í Aberdeen í mars mánaði í ár. Við stuðli úr grunninum til ídnaðarfremjandi endamál fyrireikaði Menningarstovan føroysku luttøkuna. Hóast vanliga ikki nógv verður selt á einari tílíkari messu, so vóru úrslitini so eggjandi, at fleiri fóru niður á World Fishing framsýningina í juni í ár. Á stóru olju- oog frálandavinnuframsýningini í Aberdeen í september bjóða 18 fyritøkur og samtak av fyritøkum og stovnum sínar tænastur á sama bási.

Annars eru kanska teir størstu arbeiðsskapandi møguleikarnar í at virka fiskasløg og rávøru vit ikki fyrr hava havt atgongd til. Hetta er umrøtt undir fiskivinnuni.

Vinnulívslóggáva

Síðan 1993 eru danskar vinnulívslógir, við neyðugum tillagingum, settar í gildi í Føroyum. Við hesum er vinnulívslóggávan í Føroyum ájavnt við tað, sum er galdandi í grannalondum okkara og í Evroppu yvirhøvur. Hetta merkir í roynd og veru, at føroyskt vinnulív lagar seg til millumlanda kappingarviðurskifti.

Á hesum økjum fer alla tíðina ein dagføring fram. Mannagongdin er, at danska ídnaðarmálaráðið sendir málini til landsstýrið, sum síðani ger sínar viðmerkingar, áðrenn málið verður lagt fyri løgtingið.

Serliga er at nevna ávísar broytingar í ársroknaskaparlógini. Eftir teimum broytingum, sum nú eru skotnar upp, verða strangari krøv áløgd nevnd og stjóorn at lata roknskap rættstundis inn til skrásetingarmyndugleikan, sum ger staksýnisroyndir av innkomnum ársroknskapum, konsernroknskapum og ársfrágreiðingum fyri at kanna møgulig eyðsýnd brot á ársroknskaparlóg, partafelagslóg, smápartafelagslóg, lóg um vinnurekandi grunnar ella lóggávuni viðvíkjandi bókføring. Eisini á øðrum økjum er ætlanin at fremja dagføringar.

Ídnaðarmál

Landsstýrið hevur sett sær sum ein høvuðssetning at skapa fortreytir fyri at menna ídnaðin her á landi, m.a. við lógini um stuðul til nýggjar vinnur, har veittur verður ein lønarstuðul, sum er 30% fyrsta árið, og sum síðan minkar yvir 4 ár.

Ein trímannanevnd avger, hvør vinna kemur undir hesa lóg. Stutt sagt kann alt nýtt og økt virksemi koma undir hesa lóg, sum rættuliga stórur áhugi er fyri.

Roknað verður við, at Framtaksgrunnurin fer at loysa ein part av fíggingartrupulleikunum til nýggjar verkætlanir. Tað hevur tikið sína tíð at fáa Framtaksstovnin at virka eftir ætlan, men nú skuldu øll viðurskifti verið komin í rættlug, og fyrstu tilsøgnirnar til nýggjar vinnur eru givnar.

Annars verður roynt at fáa útlendingar at gera íløgur í Føroyum, soleiðis at aðrar vinnur enn fiskivinnan verða at dúva uppá.

Landbúnaðarmál

Almenni landbúnaðarpolitikkurin hevur sum aðalmál, at teimum, ið sita við landbúnaðarjørðini, verður álagt at gagnnýta jørðina til marknaðarbúskaparligar treytir við ongum almennum stuðli.

Lóggáva, marknaðarrøkt og vegleiðing v.m. tryggja, at vinnuligt jarðarbrúk kann mennast, soleiðis at náttúruúlfeingið verður røkt og búnaðarvørur verða kappingarførar bæði í góðsku og prísi til nýtslu í Føroyum og til útflutnings.

Til at fylla hesar karmar hevur landsstýrið sett nevnd at gera uppskot um neyðugar lógarbroytingar fyri framtíðar landbúnaðin, m.a. at broyta alla landbúnaðarlóggávuna. Umboð fyri vinnuna eru síðan komin uppí nevndina.

Bygningarnar hjá Royndarstøðini í Kollafirði verða nú leigaðir Búnaðardeplinum. Endamálið er at skapa karmar um felags virksemi hjá almennum og privatum búnaðarstovnum, so teir kunnu virka í felags umhvørvi. Royndarstøðin í veranda lítki er niðurlagd, men partur av virkseminum heldur fram viðð almennum landbúnaðarroyndum, so vinnan kann fáa mestu nyttu burtur úr hesi tenastu.

Ferðavinna

Landsstýrið avgjørdi at økja játtanina til Ferðaráð Føroya úr 4,5 milt. kr. upp í 7 milt. kr., so ferðavinnan kundi fáa bestu møguleikar at mennast.

Stóra játtanin hevur økt um virksemið hjá ferðavinnuni. Við luttøku á messum og vitjan á ferðavinnustovum er samskiftið bæði innan- og uttanlands víðkað. Eisini eru fleiri faldarar gjørdir, sum lýsa Føroyar sum landið við tí óspiltu náttúruni. Nú er líggjarliga møguligt at nála longur út um heimin og harvið gera fleiri ferðafólk kunnug við landið.

Ferðaráðið flutti tíðliga í summar í størri høli, sum liggja sera vel fyri, so nú er høgligari hjá ferðafólki at nema sær vitan um landið.

Saman við Landsverkfræðinginum verða skelti gjørd, sum leiðbeina og vísa ferðafólki á tað áhugaverda á teimum ymsu støðunum um landið.

Lógamál

Uppskot um eina nýggja tryggingarlóggávu er lagt fyri tingið, sum landsstýrið sambæt avtalum við danska sjómina hevur bundið seg til. Hetta er ein nútímansgering av lóggávuni, so føroysk tryggingarfeløg nú kunnu kappast sínámillum. Uppskotið verður viðgjørt í ídnaðarnevndini sum millumtinganevnd og vantandi verður málið avgreitt í heyst.

Í løtuni verða møguleikarnar at broyta skipanina við heimatrygging av sjómonnum kannaðir so hon verður galdandi fult og heilt, tá sjómenn ikki eru umborð.

Ein arbeiðsbólkur er komin við tilmæli um ferðslulóggávuna, sum vantandi verður lagt fyri tingið í heyst. Annars fáa vit nú føroysk koyrikort, sum Bíleftirlitið umsitur.

Rúsdrekkalógin skal eftir § 25 endurskoðast í ár. Stovnar og áhugafeløg verða biðin um at gera eina meting av, hvussu lógin hevur virkað hesi tvý árini, hon hevur verið í gildi, og geva eitt ummæli um hvørjar broytingar eiga at verða gjørdar.

Arbeiðsloysið

Arbeiðsloysið minkar. Í juni mánaða í ár vóru falt 3.588 (18%) arbeiðsleys móti 4.146 (20%) somu tíð síðsta ár. At arbeiðsloysisskipanin nú ber seg líggjarliga, stavar frá minkaða arbeiðsloysinum og fólkaflytingini.

Lógin um arbeiðsloysisskipan er broytt soleiðis, at útgjaldið varð hækkað úr 67 í 70%, rullandi útgjaldið fall burtur og møguleikin fyri at vera í skipanini varð longdur úr 2 árum upp í 3 ár og 2 mánaðir. At fíggja hesar broytingar vórðu 50 mill. kr. settar á fíggjarlógina fyri 1995. Fyri at skipanin kann bera seg í longdini, krevst økt virksemi í samfelagnum t.v.s. fleiri arbeiðspláss.

Løgtingslógin um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing verður endurskoðað og roknað vereður við, at úrslitið verður lagt fram tíðliga í hesi tingsetuni. Í ár eru 8 mill. kr. avsettar til arbeiðsskapandi tiltøk fyri ung, sum kommunurnar skipa fyri.

Fólkaflytingin

Fólkaflytingin er minkað munandi fyrra hálvár 1995 í mun til fyrra hálvár 1994. Netto 230 fólk mótvegis 737 fólkum (-69%). Annars er torført at siga nakað um fólkaflytingina í hesum árinum, tí flestu flyta í summarmánaðunum. Helvtin av teimum 1923 fólkunum, ið fluttu av landinum í fjør, fluttu í juli og august.

Gongdin tykist tó vera rættiliga greið, mánaða fyri mánaða flyta lutfalsliga færri og færri samanborið við 1994. So líkt er til, at nettofráflytingin í 1995 verður minni enn 600 fólk. Fráflytingin er tó framvegis alt ov stór og er at meta sum ein heinleiðis hóttan.

Almanna- og heilsumál

Skerjingar eru ikki farnar fram á fíggjarlógini á almanna- og heilsuøkinum sum heild. Roynt verður at halda støðið; men rationaliseringar mugu fremjast fyri betringum innan játtanarkarmin.

Í sjúkrahúsverkinum er játtanin tann sama sum seinastu árini. Settur er ein eygnalækni aftrat, og víðkaða skipanin fer vónandi at virka frá september í ár.

Hildið verður fram at útbyggja konsulentskipanir á serøkjum í samráð við danska heilsuverkið, eitt nú innan barnasálarfrøði.

Suðuroyar Sjúkrahús verður ætlandi liðugt í 1997 og ætlanin er at nútímansgera landssjúkrahúsið.

Landsstýrið setti í vár eina nevnd at kanna og gera ætlanir um broytingar í sjúkrakassa-/sjúkratryggingarskipanini, herundir heilivágsstuðulsskipanini og meting av heilivágskostnaði, og onnur nevnd varð sett at kanna kommunulæknaskipanina, soleiðis at kommunulæknatænastan í útjaðaraøkjunum framyvir verður tryggjað. Nevndarálitini koma í heyst.

Rammulógin á almanna- og heilsuøkinum kom í gildi 1. juni og tí verður verandi lóggáva endurskoðað og útfyllandi lóggáva fyrireikað. Broytingarnar í forsorgarlógini, sum vórðu gjørdar í fjør, verða somuleiðis endurskoðaðar.

Verkhúsið Virkni á Berjabrekku í Havn, ið lat upp fyrra árið, verður nú sett í fullan rakstur, so hesir framúr góðu karmar um dagtilboð til brekað verða nýttir fult og heilt.

Ætlanin at útvega búfelagstilboð til evnaveik um landið verður veruleiki, tá búfelagsskapur/umlættingarheim í Vági verður liðugt.

Tørvurin á eldrarøkt verður størri næstu árini. Fleiri smærri eindir við eldrarøkt, sonevndum sambýlum, verða skipaðar. Í ár kemur eitt sambýli í Kollafirði, og næsta sambýlið verður í Vestmanna. Loysn verður eisini fonnin til røktarheimini í Sandoynnni.

Heilsu- og heimasjúkrasystraskipanin og Heimahjálpin verður undir heitinum Heimarøktin lagdar undir eina leiðslu.

Arbeiðsbyrðan á Almannastovuni er nógv vaksin, og tí er játtanin økt. Tænastustøðið skuldi nú verið betri.

Íbúðamál

Tiltøk at bøta um støðuna hjá sethúsaeigarunum eru sett í verk. Samanlagt ein lætti uppá 700 mill. kr. Rentufrádrátturin, sum kemur øllum sethúsaeeigarum við sethúsaskuld til góðar, var hækkaður.

Peningastovnarnir og Húsalánsgrunnurin royna at lætta um hjá teimum mest skuldartyngdu sethúsaeigarum. Lán verða umløgd, so skuldin hjá teimum, sum koma undir skipanina, verður skjótari niðurgoldin. Harumframt er rentan á øllum 4. veðrættarlánum lækkað.

Skúlamál

Løgtingið hevur samtykt nýggjar lógir fyri studentaskúla- og HF-útbúgvingina, sum eru dagførdar m.a. við atliti til upptøkutreytunum til hægri lærustovnar, eitt nú í Danmark.

Studentaskúlaskipanin er nú valskipan. Næmingarnir kunnu velja tær lærugreinir á teimum stigum, teimum førvar í framhaldsútbúgvingunum. Tann stóra kjarnan av grundleggjandi lærugreinum er varðveitt.

Í ár hava fyrstu HF-næmingarnir fingið hægri tøkniligt prógv, sum er gott grundarlag undir hægri vinnuligari útbúgving ella starvi í føroysku vinnuni.

Samhært fólkaskúlalógini eigur ein undirvísingarætlan at verða gjørd fyri hvonn fólkaskúla. Við støði í teimum nýggju almennu lesiætlanunum hava mi flestu skúlar gjørt sínar egnu ítøkiligu undirvísingarætlanir, sum eru senda landsskúlafyrisitingini til staðfestingar. Sostatt eru nútímans lunnar lagdir undir alt virksemi fólkaskúlans.

Ein ráðleggingarnevnd er sett at endurskoða 16 ára gomlu fólkaskúlalógina. Nevndin er komin væl áleiðis. Væntandi verður uppskot lagt fyri løgtingið í hesi setuni.

Landsmiðstøðin fyri undirvísingarambað hevur 5 ár á baki. Við seravtalu við postverkið hava skúlar um alt landið lættari atgongd til undirvísingarambaðini á Landsmiðstøðini. Tøkniligu frambrotini krevja, at lærarar støðugt fáa upplýsing, útbúgving og ráðgeving, og Landsmiðstøðin ein týðandi táttur í hesari menning.

Lógin um lærlingaviðurskifti er broytt soleiðis, at læruplássið fær 75% í lønarendurgjaldi, meðan lærlingurin er í skúla. Tað skuldi givið fleiri læruplass, bæði í handverksvinuni og skrivstovuyrkinum.

Maskinmeistaraskúlin er fluttur í nýggj og stásilig høli við Oyggjarvegin. Nú skuldi høllstørvurin verið nøktaður í mong ár.

Lógin um yrkisskúlar og lógin um skúlafyrisiting verða endurskoðaðar.

Grundvøllurin undir allari vísund er gransking. Landsstýrið arbeiðir við uppskoti til lógarverk um granskingarráð, sum m.a. skal ráðgeva landsstýrinum í øllum granskingarspurningum.

Í sambandi við sparingar á fíggjarlógini varð skipanin við ferðaískoyti broytt so, at lesandi fáa eitt ferðaendurgjald frá stuðulsstovninum fyri heila ella lutvísa ferð millum Føroya og Dannarkar. Stuðulsstovnurin yvirtekur umsitinginga av teimum gomlu landsstýrislánunum til lesandi frá gjaldstovuni.

Nýggj ætlan

Á norðurlandaráðsfundinum í vár bar løgmaður fram áhugaverda ætlan, sum fekk stóra umtala millum norðurlond. Talan er um ein norðurlendskan granskingarstovn innan havklima og innan gransking av kendum liskastovnum serliga í útnorðurpartinum av Atlantshavi. Landsstýrið ger nú fyrieikingararbeiðið, og ætlanin er, at stovnurin skal vera í Føroyum, sum vit fíggja samun við hinum norðurlondunum.

Mentanarmál

Til tess at lýsa mentanarvirksemið í Føroyum, sereyðkennini í føroysku mentanini og viðurskiftini hjá listafólkum í Føroyum er nevnd nýliga sett at tilevna eitt álit um tryggari karmar í einum framtíðarpolitikki.

Til tess at tryggja, at almennir stovnar hava neyðturviligt fyrilit fyri savnindum sínum, hevur landsstýrið samtykt kunngerð um almenn savnindi og virksemið hjá Føroya Landsskjalasavni.

Hølisviðurskiftini hjá landsskjalasavninum eru út av lagi, har krevjast namandi áhotur.

Føroya Formminnissavn hevur havt stóran torv á hóskandi goymsluhølum. Hesin trupulleikin er nú loystur við keypinum av bygninginum í Høyvík. Landsstýrið arbeiðir við at endurskoða formminnalóggávuna.

Gleðiligt er at ásanna, at heilar tvær kirkjur eru vígdar, síðani hetta landsstýrið tók við. Landsstýrið fer í holt við at nútímansgera kirkjulóggávuna í Føroyum og gera uppskot til nýggja lóg um kirkjuskatt.

Útvarpið fór í fjør undir at endurnýggja FM-sendinetið. Nýggir hovuðssendarar eru keyptir til Húsareyn, Brúnaskarð og Hestin, og er ætlanin at seta teir upp í heyst.

Sjónvarpið hevur tørv á betri húsaviðurskiftum og serliga verður arbeitt við at útvega góð upptøkuhøli.

Kommunumál

Stóri trupulleikin hjá kommununum er kommunuskuldin. Skuldin er uml. 2 mia. kr. íroknað KOB og IRF. Eitt ítøkiligt uppskot til avtalu um endurfígging av kommunuskuldini er nú komið á borið og kann endalig avtala um endurfíggingina koma í gildi í heyst. Avtalan er galdandi í 5 ár og fer at geva ein árligan gjaldførisbetta uppá uml. 100 mió. kr.

Eftir kommunalu fíggjarætlanunum fyri 1995 varð roknað við skattainntøkum uppá 609 mió. kr. og útreiðslum uppá 654 mió. kr. Men eftir gomlu gongdini higartil í ár verður mett, at skattainntøkurnar verða uml. 660 mió. kr. Frá 1994 til 1995 hækkaði miðal kommunuskattaprosentið úr 20,4% í 1994 til 21,12% í 1995. Eftir endurfíggingina av kommunuskuldini verður helst moguligt at lækka miðal kommunuskattaprosentið fyri komandi fíggjarár nakað, hóast tær kommunurnar, sum eru ringast fyri, ikki eru førar fyri tí.

Landsstýrið legði í vár uppskot til samtyktar fyri tingið at seta nevnd at gera uppskot um nýggja kommunuskipan. Tá viðgerðin í rættarnevndini ikki var liðug, áðrenn seinasta tingseta endaði, samtykti løgtingið, at rættarnevndin sum millumtinganevnd skuldi viðgera málið. Nevndin leggur fram álit í málinum í seinasta lagi 1. oktober 1995.

Orkumál

Umhugsað verður at halda fram við vatnorkuútbyggingini í Norðureysturoy. Verkætlan og kostnaðarmeting verða dagførd og innanlendis fíggingarmøguleikar verða kannaðir. Roknast kann við umleið 30 nýggjum arbeiðsplássum í meðal um árið, meðan útbyggingin fer fram.

Umhvørvismál

Viðvíkjandi umhvørvisverndini hava kommunurnar fingið eftirlitið á staðnum. Neyðugt verður at samskipa og effektivisera eftirlitið. Nevnd er sett at gera uppskot til heildarætlan av umhvørvisvernd fyri Føroyar, og frágreiðing er send landsstýrinum, og heldur fram við víðkaðum arbeiðssetningi.

Samskiftismál

CANTAT-kaðalin í Tjørnuvík er tikin í nýtslu. Hetta gevur stórar møguleikar úteftir. Telefonverkið arbeiðir við at útbyggja netið, har málið er at digitalisera allar Føroyar.

Kannað verður, um møguleiki er fyri at leggja Landsverkfrøðingin og Matrikulstovuna saman. Landsverkfrøðingurin hevur latið úr hondum álit um havnaviðurskifti í sambend við oljuvinnu, og stovnurin kannar eisini tørvin á tyrhúthúnaði í hesi vinnu.

Strandfaraskip landsins, sum hevur nærum allan ferðafólkaflutningin og skipaðan farmaflutning um hendi, er komin í fasta lego. Tænastustøðið er lagað til fíggjarligu umstøðurnar, og stovnurin gerst meira sjálvfíggjandi. Flestu flutningsamboðini eru tó gomul og slitin, so tíðgur verða neyðugar í næstum, skal tænastustøðið haldast.

Arbeitt verður við at fjarstøðan frá meginlandinum ikki skal vera ein trupulleiki fyri útflutningsvinnuna. Neyðugt er, at hesin flutningur verður skipaður sum ein tænasta fyri vinnulívið.

Undirgrundin

Í 1993 varð farið undir fyrireikingar til eina komandi oljuvinnu á føroyskum øki. Fyrireikingarnar halda fram og miðað verður ímóti, at fyrsta útbjóðingarumfarið verður á várið 1997.

Oljuráðleggingarnevndin varð sett í mai í fjør at gera ein undirgrundarlóggávu v.m., sum smaan við aðrari neyðugari lóggávu á økinum verður løgd fyri løgtingið tíðliga í tingsetuni 1996/1997.

Seismisku kanningarnar, sum byrjaðu í fjør, halda fram og er oljufelagið Western júst við at leggja seinastu hond á henda partin av arbeiðnum. Tá tað er liðugt, eru seismiskar havbotnskanningar, og eitt australskt felag nevnt World Geoscience, hevur júst fingið loyvi at gera magnetiskar kanningar og laserkanningar við flogfari.

Áhugin fyri føroyska økinum er rættiliga stórur, og nógv oljufeløg keypa sær nú rætt til úrslitini av teimum forkanningum, sum eru og verða gjørdar.

Samanumtikið kann sigast, at vit ganga eini spennandi tíð í møti. Greitt er at hetta er ein vinna, ið er torfør at spáa um. Nógv lond og samfeløg hava sett stórar vónir til hesa vinnu uttan at nakað munagott spurdist burturúr. Tað er tí neyðugt, at vit miðvíst arbeiða ímóti at fáa eina oljuvinnu í gongd. Er oljuríkidømi í undirgrundini, mugu vit vera til reiðar at taka við avbjóðingunum, bæði politiskt, vinnuliga, mentanarliga, fyrisitingarliga og á annan hátt.

Uttanríkismál

Samráðingarnar um landgrunnsmarkið Føroya og Bretlands millum halda fram. Sum áður nevnt vísa altjóða oljufeløgini alsamt størri áhuga fyri økinum landanna millum, og tørvurin er stórur at fáa skil á murknaviðurskiftunum á hesum havleiðum, har tað framvegis er eitt rættiligt stórt havbotnsøki, sum seinja ikki er fingin um.

Hóast nógvar fundir á embætismannastigi, serliga seinastu tvey árini og samráður á ráðherrastigi, er lagt partanna millum. Royni verður at finna eina samráðingarloysn, so sleppast kann undan triðja parti, altjóða dómstólinum í Haag. Tað, sum eftir er av 1995, fer væntandi at vísa, um tað fer at eydnast.

Handilsavtalur við øll EFTA-londini vóru avgreiddar í fjør og nú eru skipa handilslig viðurskifti við hesi lond. Hesa fríhandilsavtalur fevna eisini um fisk.

Trý EFTA-lond gjørdust limir í ES á nýggjárinum. Hetta førdi við sær, at sáttmálarnir við hesi lond skuldu far úr gildi sama dag, og at sáttmáli okkara við ES síðani skuldi broytast til eisini at umfata handilssamstarvið, ið vit hava við hesi lond.

Av praktiskum orsøkum var í desember 1994 gjørd avtala við ES um, at verandi sáttmálar við Svøriki og Finnland skuldu halda fram til samráðingar um nýggjan sáttmála við eitt víðkað ES vóru førdar at enda. Samráðingarnar byrja so skjótt fyrireikingarnar eru av.

Arbeiði í felagsnevndini Føroya-ES er skipað í føstum kørmum, og nøkur úrslit vinnuni til fyrimunar hava spurst borturúr samráðingunum. Tó má ásannast, at verandi handilsavtala innihaldsliga er ov trongur karmur um okkara samskifti við ES í einum heimi, ið er undir støðugari broyting á ølfum samfelagsøkjum.

Landsstýrið hevur sett sær fyri at gera nakað munagott við hetta og setti fyrr í ár nevnd at kanna gagnligastu marknaðaratgongdina til europeiska marknaðin. Álitið frá hesi nevnd verður grundarlagið undir einum breiðum orðaskifti um framtíðarviðurskifti okkara við ES.

Ársfundurin í altjóða hvalaveiðunevndini (IWC) í Dublin samtykt eina yvirlýsing um føroyska grindadrápið, sum hevur sera stóran týdning fyri møguleikar okkara at verja okkum móti ágangi.

IWC tók í yvirlýsingini til eftirtektar tað arbeiðið, sum myndugleikar og grindamenn í Føroyum hava gjørt seinastu árini. IWC eggjar føroyingum til:

- at halda fram við ut finna aðrar loysnir enn sóknarongulin,
- at seta í verk upplæring í drápshátti við atliti til at stytta um drápstíðina og
- at geva limalondum og fakligum arbeiðsbólkum í IWC lut í tilfari um drápshátt.

Henda yvirlýsing kemur í staðin fyri yvirlýsingarnar í 1986, 1992 og 1993, sum beinleiðis áløgdu Føroyum at gera ávísar broytingar í reglunum um grindaveiði, og sum áløgdu Føroyum at geva IWC frágreiðingar um drápsháttin.

Yvirlýsingin í ár áleggur Føroyum ongar skyldur mótvegis IWC. Tað einasta, ið IWC eggjar okkum til, er at vera við í fakligum samstarvi í arbeiðsbólkum um drápshættir. Tvey tílík hava verið, í 1992 og í ár. Annars eggjar hon at halda fram við arbeiðnum, sum grindamenn og myndugleikar hava gjørt til dagin í dag.

Landsstýrið hevur um NAMMCO sett spurning at gagnnýta døgling. Eitt úrslit av hesum eer, at bannið móti at reka døgling á land er avtikið. Landsstýrið fer nú at seta spurningin í uttanríkismálaráðnum um, at bannið fyri døglingaveiðu yvirhøvur verður avtikið.

Norðurlandasamstarvið

Tá ið tað gjørdist greitt, at tey trý norðurlundinni í Finnlandi, Álandi og Svøríki gjørdist limir í europeiska samveldinum, settu Norðurlandaráðið og Norðurlandaráðharraráðið nevnd at kanna og seta út í kortið, hvussu samstarvið skal vera í komandi tíðum.

Tað eydnaðist landsstýrinum at fáa sjálvstøðuga umboðan í hesi nevndini, so nú hava vit fyri fyrstu ferð verið við til at gera av, hvussu samstarvið verður.

Nevndararbeiðið er liðugt, og Norðurlandaráðið tekur endaliga støðu. Men alt bendir á, at Føroyar, Grønland og Áland verða sjónligari í hesum samstarvi.

Útnorðursamstarvið, sum hevur tíggju ár á baki, varð í vá víðkað við Vestur- og Norðurnoregi og eitur nú Norðurlendska Atlantssamstarvið. Høvuðsskrivstovan hjá hesum samstarvi verður verandi í Føroyum.

Landsstýrið ætlr at fáa eina skipaða umsiting av norðurlendska samstarvinum, soleiðis at luttøkan hjá løglinginum og landsstýrinum verður betri samskipað.

Útlit

At umrøða tað, sum er hent, kann vera áhugavert. Men tað er ikki givið, at hetta loysir framtíðar trupulleikar. Og tað er hetta, vit skulu nýta okkara tíð og orku til frá í dag.

Havandi í huga, at Føroyar í veruleikarnum eru farnar á búsagang og gingu undir harðar treytir, eiga vit at semjast um, hvat vit í felag skulu leggja fram fyri danir í næstu samráðingunum, og hvat vit skulu krevja av teimum.

Samstundis skulu vit innanhýsis semjast um, hvat vit skulu gera fyri at vinna aftur ein part av tí álit, føroyingar fyrr høvdu uttanlands.

Eg eri fullvissur í, at almennu vitjanirnar úr Danmark eru mangagóð stig á leiðini. Vit eiga at halda fram á hesi leið. Samskiftið við útlendsku stórfeløgini í oljuvinnuni kunnu, um rett verður atburið, eisini verða okkum til fyrimuns.

Vit verða eisini noyddir til at tryggja okkum, at umsitingin av okkara fiskastovnum, í styttri og longri áramál, fer fram á ein hátt, sum gevur álit, bæði heima á landi og í útlandinum.

Vit mega tryggja okkum, at fíggjarpolitikkurin, fiskivinnupolitikkurin og okkara løggáva sum heild, verða fylgd og løgd soleiðis til rættis, at vinnan og kravánararnir hava álit á politikkinum.

Eg havi ávíst, at tað bevur eydnast okkum at venda afturgongd til framgongd. Hetta er ein sannroynd, sum allir føroyingar eru greiðir um.

Men hetta merkir tó ikki, at vit eru komin á mál. Vinnan er ikki komin uppundan aftur. Almenna økið er ikki dagført til støðið, sum tað eigur at vera á. Borgarin kennir seg ikki hava fingið rímulig livilíkindi, hvørki tá ið ræður um skattastrýst, fíggjarligan tryggleika ella arbeiðsmøguleikar.

Fyri at framgongdin skal kunna standa við og nemnast er neyðugt, at føroyskir politikkarar ásanna tann veruleika, at samfelagið hevur fingið ein skelk.

Vit mega í felag ásanna, at ongar skjótar og lættar loysnir eru tøkar, og at tað er neyðugt í felag at leggja til rættis ein miðvísan politikk fyri framtíðina, sum fet fyri fet byggir uppaftur tað fíggjartiga grundarlagið undir okkara samfelagi, sum í størst møguligan mun minnir um ta støðuna, sum var, áðrenn vit místu búskaparliga fótafestið.

Sitandi landsstýrið fer at ruddu slóð fyri einum samfelagi við meira fjøltáttaðum vinnuvegum, so samfelagum verður tryggjað støðuga framgongd.

Eg fari at enda at beita á Føroya Løgting – bæði samgongu og andstøðu – um stuðul til hetta arbeiðið.

Góða ólavsøku.

1 Broyting í løgtingslóg um ábyrgdargrunn

Ár 1995, mánadagin 31. juli legði Ivan Johannesen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ábyrgdargrunn

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 69 frá 10. mai 1994 um ábyrgdargrunn sum broytt við løgtingslóg nr. 109 frá 29. juni 1995 verður gjørd henda broyting:

1) Í § 1 a verður sum nýtt stk. 5 sett:
"**Stk. 5.** Stuðul eftir § 1 a, stk. 1-4, kann veitast til virking av kongafiski úr Irmingarhavinum (Sebastes mentella, oceanic type), landaður til føroysk virki av føroyskum skipum aftaná 15. mai 1995."

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar

27. apríl 1995 varð uppskot lagt fyri løgtingið um at broyta løgtingslóg um ábyrgdargrunn. Samtaem løgtingslóg nr. 109 frá 29. juni 1995 um broyting í løgtingslóg um ábyrgdargrunn fekk landsstýrið heimild at játta stuðul til ávísar verkætlanir, herundir Irmingarhavsætlanina.

Skip fóru í Irmingarhavið á kongafiskaveiðu longu í mai mánaða. Føroysk virki høvdu roknað við at fáa stuðul til at virka fiskin, men hesa heimild fekk landsstýrið ikki fyrr enn eftir, lógin varð lýst.

Tí verður uppskot lagt fyri tingið um at landsstýrið fær heimild at veita stuðul til virking av kongafiski úr Irmingarhavinum, landaður til føroysk virki av føroyskum skipum aftaná 15. mai 1995.

Kostnaðurin av hesi broyting verður lítil, tí talan er bert um at veita stuðul í hálvanannan mánað afturat, og verður sostatt hildin innanfyri játtanina uppá 15 mió. kr. í § 1 a, stk. 1.

1. viðgerð 2. august 1995. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

Loyvi til frávik í tíðarfreistini varð fingið.
2. viðgerð 4. august 1995. Uppskotið samtykt við 23-0-1 atkvøðum.

3. viðgerð 7. august 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 17-0-2 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 123 frá 7. august 1995.
F.L. j.nr. 1218-10/94

2 Broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap

Ár 1995, mánadagin 31. juli legði Ivan Johannesen, landsstýrismaður fram setjándandi

U p p s k o t

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 27 verður orðað soleiðis:

"**§ 27.** Heildarkvotur á landleiðunum fyri fiskifør undir føroyskum flaggi verða ásettar fyri hesar fiskastovnar frá 1. september 1995 til 31. august 1996

Tons rund vekt:

Toskur á Føroya Banka	500
Toskur á landgrunninum	10.000
Hýsa	10.000
Upsi	39.000
Kongafiskur	10.000

§ 2.

Henda lóg fer gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Lagtingslov om ændring i lagtingslov om erhvervsmæssigt fiskeri.

§ 1.

I lagtingslov nr. 28 af 10. marts 1994 om erhvervsmæssigt fiskeri foretages følgende ændringer:

1) § 27 affattes således:

"**§ 27.** Totalkvoter på fiskeriterritoriet for fiskefartøjer under færøsk flag fastsættes for nedennævnte fiskebestande for tidsrummet 1. september 1995 til 31. august 1996:

Tons rund vægt:

Torsk på Føroya Banka	500
Torsk på landsokkelen	10.000
Kuller	10.000
Sej	39.000
Rødfisk	10.000.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter, at den er bekendtgjort.

Viðmerkingar:

Samsvarandi § 22 í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap við seinni broytingum skulu heildarkvoturnar fyri fiskiárið 1. september 1995 til 31. august 1996 ásetast innan 10. august. Fiskirannsóknarstovan og Stovnsrøktarnevndin hava latið landsstýrinum sínt tilmæli, sum eru bjáløgd hesum máli sum lýtgiskjal.

Í ráðgevingini frá ICES í 1994 varð sagt, at varð berr hugt eitt ár fram, so átti eingin fiskiskapur at verið eftir toski og hýsu og upsafiskiskapurin átti at verið skorin niður í 22.000 tons. Fiskirannsóknarstovan segði seg vera samda í stovnsmetingini frá ICES og skjeyt upp, at MLV fyri tosk og hýsu vóru sett so lágt sum gjørligt og, at upsa MLV varð uvmarkað til 36.000 tons. Tá hetta varð sammett við uppskotið hjá bygnaðarnevndini um, hvussu stovnarnir kundu byggjast upp aftur eftir eini 5 ára ætlan, var niðurstøðan hjá landsstýrinum, at eingin tvídráttur var millum lívfrøðiligu ráðgevingina og ætlanina hjá bygnaðarnevndini, sum landsstýrið og løgting hevdu lagt til grund fyri áseting av MLV 10. mars 1994. Stovnsrøktarnevndin legði hetta áðrið dem á, at vøksturin hjá fiskinum var batnaður og henda okta vekt kundi fiskast beinanvegin, heldur enn at koma stovninum til góðar. Teir skutu tí upp 9.800 tons av toski á landgrunninum og 8.500 tons av hýsu.

Í 1995 eru somuleiðis tvey tilmæli.

Fiskirannsóknarstovan vísir í sínari frágreiðing á, at við vánligari tilgongd og álitandi veiðu vóru gýtingarstovnarnir av toski, hýsu og upsa á tí lægsta støði nakrantíð, sum stovnsmetingar eru fyri. Tí hevur verið vístá, at ongin fiskiskapur átti at vera eftir toski í 1993, 1994 og 1995, og at ongin fiskiskapur eftir hýsu átti at vera í 1994 og 1995 eins og fiskiskapurin eftir upsa átti at minka nøkkrandi. Stovnsmetingarnar fáa vísu, at støðan er batnað nakað, men at gýtingarstovnarnir av toski og hýsu eru minni enn lívfrøðilipa ráðligt og at veiðan tí eigur at vera so lítil sum ráðligt. Tilgongdin av hýsu frá 1993-94 verður góð og tilgongdin av toski frá gýtingini 1993 er hampulig. Fyri upsan er gýtingarstovnurin eisini á lágum støði og veiðan eigur at vera á sama støði. Fyri kongafisk eigur veiðan at minka 30%. Toskur á Føroya Banka eigur

framhaldandi at vera munandi avmarkaður.

Fiskirannsóknarstovan mælir til hesi MLV komandi kvotaár:

Kvota 1995/96	
Toskur LG	10.000 tons
Toskur FB	500 tons
Hýsa	8.500 tons
Upsi	39.000 tons
Kongafiskur	10.000 tons

Stovnsrøktarnevndin vísir á økta tilgongdina av toski og hýsu hjá øllum veiðihattum, serstakliga í vár av toski. Upsafiskiskapurin er mettur støðugur, tó at veiðan í ár er lægri enn seinasta ár. Her verður víst á, at orsøkin er, at toska- og hýsukvotan er sett so lágt, at upsakvotan fæst ikki upp uttan stórar hjáveiðitrupulleikar av toski og hýsu. Víst verður á, at kongafiskastovnurin hevur ikki verið væl fyri seinastu árini og royndirnar í Inningarhavinum og eftir búrfiski hava gjørt, at kongafiskaveiðan er minkað.

Stovnsrøktarnevndin mælir til hesi MLV komandi kvotaár:

Kvota 1995/96	
Toskur LG	19.500 tons
Toskur FB	1.400 tons
Hýsa	14.300 tons
Upsi	37.500 tons
Kongafiskur	13.500 tons

Nevndin grundgevur sínar metingar út frá teimum góðu umstøðunum á landgrunninum, har tann stóra nøringin av føðini vísir seg í vektini á fiskinum, at stór íblanding er av fiski uttanífrá og vísir til yvrlítstrolingarnar hjá Magnus Heinason frá 1983 til 1995 saman við tølum hjá ICES og Fiskirannsóknarstovuni sum útrokningargrundarlag, hvussu stórur gýtingarstovnurin av toski er. Út frá hesum verður mett, at gýtingarstovnurin fyri 1995 er góð 82.000 tons. Sami útrokningarháttur vísir eisini, at gýtingarstovnurin í 1991 var niðri á sløk 9.000 tons. Stovnsrøktarnevndin ásannar, at tað, at koma við tilmæli um MLV er álvarsmál, tí hetta avgerð, hvussu búfeikast skal í hesum landi. Nevndin vísir á, at eitt lægri MLV ger umstøðurnar í fiskiflotanum ótolandi og elvir til, at stórur partur av tilfeinginum verður ikki veiddur.
Uppgávan hjá stovnsrøktarnevndini er sambæt lógina at geva landsstýrinum tilmæli um mest loyvdu veiði. MLV er lívfrøðiligt hugtak og má í grundast á lívfrøðilig sjónarmið. Stovnsrøktarnevndin gevur ikki haldgóðar, lívfrøðiligar grundir fyri tey MLV, teir skjóta upp. Almennu bugleiðingarnar um árgangir, eti, yvirlítstrolingar og fisk, sum kemur uttanífrá eru viðgjørdar gjøtla av Fiskirannsóknarstovuni og einki tilfar er tókt, sum stuðlar tulkingunum hjá stovnsrøktarnevndini.

Seinasta brotið í grundgevingini er" at eitt lægri MLV ger umstøðurnar hjá fiskiflotanum ótolandi". Stovnsrøktarnevndin ásannar sjálv, at lítil og eingin tillaging er hend í fiskiflotanum seinasta árið. So leingi hendan búskapartiga tillaging ikki hendir, so fer eitthvørt MLV at gera umstøðurnar hjá fiskiflotanum ótolandi. Hetta seinasta er ikki uppgávan hjá stovnsrøktarnevndini at taka inn í myndina, men uppgávan hjá Fiskivinnu Starvsnevndini og politisku myndugleikunum.

Fiskivinnu Starvsnevndin hevur viðgjørt málið og hevur ongar lógartekniskar viðmerkingar.Við útgangsstøði í tilmælinum frá Fiskirannsóknarstovuni mælir nevndin til, at eitt MLV verður ásett, sum er politiskt gjørligt fyri tey einstøku fiskasløgini.
Nevndin hevur viðgjørt tilmælin frá Fiskirannsóknarstovuni og frá Stovnsrøktarnevndini og kundi ynskt tveir spurningar betri lýstar. Annar er, um toskurin við Føroyar kann metast sum serføroyskur ella sum føroyskur stovnur við avmarkaðari ferðing? Hin er, um toskur við myrkum/svørtum reiygi kemur aðrastaðni frá, ella bert av aðrari føroyskari leið?

Nevndin mælir til, at besir báðir spurningar verða hægri raðfestir. Tá kanningarætlanir verða lagdar aftur, so minkast kann um besi ivanrál, ið eftir nevndarinnar tykki er størsti munurin millum hæði tilmælini.

Gongdin í tilmælunum hevur verið hendan:

	Mars 1994*)	Juli 1994		Juli 1995		
**)	Uppskot LS	Tilmæli FRNS.	Tilmæli STRN	Uppskot LS	Tilmæli FRNS.	Tilmæli STRN
Toskur LG	6.800	So lágt sum gjør.	9.800	6.800	10.000	19.500
Toskur FB	1.400	1.000	1.400	1.400	1.000	1.400
Hýsa	6.000	So lágt sum gjør.	8.500	6.000	8.500	14.300
Upsi	41.500	36.000	40.000	41.500	39.000	37.500
Kongafiskur	13.300	15.000	15.000	13.300	10.000	13.500

*) Helvtin áset fyri hálvt kvotuár.

**) LS=Landsstýrið ; FRNS–Fiskirannsóknarstovan ; STRN=Stovnsroktarnevndin

Av MLV skal útlendsk veiða undir Føroyum trekkjast frá. Fyri áseting av heildarkvotum verður roknað við hesum miðalvirðum fyri útlendsku veiðuna: Toskur á landgrunninum 200 tons, hýsa 200 tons, upsi 500 tons og kongafiskur 1200 tons.

Landsstýrið heldur, at tilmæli frá Fiskirannsóknarstovuni kann nýtast sum grundarlag fyri einum vísindaliga grundaðum MLV, sum tryggjar stovnunum besta møguleika at vaksa aftur til tað lívfrøðiliga fursvarliga, tí náttúran er Føroyum til vildar. Tilmæli er sakliga og lívfrøðiliga vel grundað og byggir á stórt kanningararbeiði. Á fundum við landsstýrið, hevur Fiskirannsóknarstovan gjørt greitt, at tilfarið, teir hava at arbeiða við, er viðgjørt so vel sum gjørligt og ikki er møguligt at koma til onnur úrslit enn tey, teir leggja fram. Seinastu yngulkanningar sýna helst eisini, at tann vekstur, sum er í sjónum, ikki altíð vísir seg í góðum árgangum ella øktum vekstri hjá gagnfiskunum, men kanska meira í, at fiskurin tekur seg meira saman. Landsstýrið hevur tó við grundgevingunum hjá Fiskirannsóknarstovuni (bláðsíðu 35 í frágreiðingini) hækkað heildarkvotuna av hýsu til 10.000 tons og vísir samstundis á, at málið við at fáa henda stovn á lívfrøðiliga trygt støði verður rokkið í 1998 við eini heildarveiðukvotu, sum er 10.000 tons og sum er í tráð við tilmæli frá Bygnaðarnevndini.

Landsstýrið fer at biðja Fiskirannsóknarstovuna um at endurskoða sítt tilmæli um botnfiskastøgini í seinasta lagi í mars 1996.

Landsstýrið hevur tað grundsjónarmið, at við vísindaliga grundaðum MLV skulu stovnarnir byggjast upp aftur og tá teir eru komnir í eina góða legu, skal úrtøkan vera borðardygg. Vinnan og vinnufelagini hava yvirhevur tað sjónarmið, at stovnsroktin kann gerast við tekniskum reguleringum uttan MLV ella kvotur. Endamálið má tí verða at skipa so fyri, at fiskivinnan, herundir fiskiflotin, virking og sølan av fiski virkar undir marknaðarbúskaparligum treytum og vinnur nóg nógv av peningi til at svara hvørjum sín og at veita fólkinum í fiskivinnuni eina rímiliga úrtøku og trygg arbeiðsplass.

Úrtøkuningarnar vísa, at øktar kvotur ella veiða ikki loysir hendan málsetning. Tá stovnarnir eru bygdir upp aftur og hesar kvotur verða býtar eftir galdandi lóg til tey skip, sum eru í flotanum, so verður við galdandi prísum alt ov lítið í part hjá øllum skipaflotanum oman fyri 100 tons. Av búskaparligum orsøkum verður tí uttan mun til hvussu høgar kvoturnar verða - eitt stoðugt trýst at fiska meira enn kvoturnar, við teimum avleiðingum hetta hevur fyri eftirlit og annað. Orðaskiftið má tí verða um, hvussu stórar kvoturnar skulu vera í uppbyggingartíðini til eitt orðaskifti um, hvussu veiðiorka og virkingarorka laga seg til rávarutilfeingið, tá stovnarnir eru bygdir upp aftur.

Landsstýrið leggur í sínum uppskoti dent á at tryggja, at gýtingarstovnurin veksur aftur, og tann óvissa, sum altíð vil vera í fiskiskapi, verður so lítil sum gjørligt og at endamálsorðingin í lógini at varðveita tilfeingið og at troyta og gagnnýta hetta borðardygt á skilalesta hátt, lívfrøðiliga og búskaparliga, við virðing fyri samhandinum millum ymiska dýra- og plantustovnarnar í havinum og meingi teirra, til less at tryggja besta samfelagsbúskaparliga ískastið frá fiskivinnuni, stoðugar arbeiðs- og inntøkumøguleikar og møguleikar fyri vinnuligum virksemi um alt landið, verður fylgt. Ásannast má, at nátúran seinastu 2 árini hevur verið til vildar, og at tann økta tilgongdin av toski og hýsu, sum má tí, fyri at stovnarnir kunna vaksa, er komin.

Náttúran hevur gjørt sín part og nú er takið at bera so í bandi, at stovnarnir fáa møguleika at vaksa og veiðan kemur í eina trygga legu.

Tað, sum er nevnt omanfyri skuldi verið nóg mikið í sjálvum sær til at vísa á týdningin av einum skynsamiligum fiskivinnupolitikki. Haraftrat kemur, at landsstýrið í avtaluni 17. november 1994 við donsku stjórnina hevur bundið seg til tað sama. Tað er landsstýrisins avgjørda meting, at skulu avtalurnar um endurfígging fáa sítt rætta skap og samstundis fáa størri ábyrgd aftur til føroyskar myndugleikar, so er ein skynsamiligur fiskivinnupolitikkur, sum tryggjar bæði lívfrøðiliga og búskaparliga, ein neyðug fyritreyt. Danska stjórnin og nauheimurin, eisini lángevarar, vilja gjølla kanna, um føroyskir politiskir myndugleikar reka ein ábyrgdarfullan politikk í høvuðsvinnuni.

1. viðgerð 2. august 1995. Málið varð beint í vinnunevndina, sum 3. august 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 31. juli 1995 og eftir 1. viðgerð 2. august 1995 beint í vinnunevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tríggjar minniluta.

Meirilutin (Henrik Old, Jákup Joensen, Karl Robert Johansen og Álvur Zachariasen) vísir á, at Fiskirannsóknarstovan í tilmæli sínum m.a. sigur: "Tíbetur sær tað út til, at tilgongdin av hýsu frá gýtingunum í 1993 og 1994 verður góð, og helst verður tilgongdin av toski frá gýtingini í 1993 eisini hampulig. Endaligar metingar um støddina av hesum árgangum, fáa vit tó ikki, fyrr enn teir koma inn í fiskiskapin við ársenda í 1995 og í 1996. Tað er tí neyðugt at verða varin, til støddin á árgangunum er betur staðfest".

Meirilutin leggur dent á, at tilmælið um botnfiskasløgini verður endurskoðað fyrst í komandi ári, fyri at fáa eina neyvari meting av botnfiskastovnunum. Meirilutin tekur tí undir við uppskoti landsstýrisins og mælir tinginum at samtykkja tað.

Minnilutin (John Petersen) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins, men mælir til, at MLV-ið fyri komandi ár verður lagt eftir tilráðingini hjá Stovnsrøktarnevndini, tó við tí undantaki, at toskaveiðin á Føroya Banka verður sett til 1.000 tons, sum bert er 30% av veiðinøgdini á Bankanum, tá hann var opin.

Minnilutin (John Petersen) heitir á landsstýrið skjótast gjørligt at taka upp samráðingar við vinnuna um at seta aðra skipan í gildi fyri verandi kvotuskipan, sum ger alla praktiska fiskiveiði høpisleysa, sum hevur ført til 1.000-tals tons í veiðimissi og 100-tals miljóna tap í útflutningsvirði í ár og komandi ár, sum avskeplar veiðihagtøl, beinir fyri grundarlagnum undir framtíðar útrokningum og fiskiætlanum, tí kvotaskipanin tvingar skip at blaka smáfisk út, so at tey harðast kvoteraðu fiskasløgini verða mest ovurfiskað.

Minnilutin (John Petersen) kann ikki góðtaka grundgeving meirilutans um, at tað í heyst ber til at síggja, hvussu nógv av árganginum frá 1993 kemur inn í fiskiskapin í heyst. Tí, um fiskiskapurin í heyst verður so góður, sum fiskimenn væntа, og sum fiskifrøðingar meta, so kemur smáfiskur als ikki at síggjast í veiðihagtølum av tí at roknast má við, tá so lítil kvota verður tillutað, sum nú sær út til, at stórur partur av smáfiskinum als ikki kemur at síggjast. Tískil verður tilmælið frá fiskifrøðingum í mars komandi sama tonsatal sum nú. So missa bæði fiskivinnan og samfelagið aftur stór virði.

Minnilutin (John Petersen) grundar sítt tilmæli um at fylgja Stovnsrøktarnevndini í áseting av MLV á:

1. Rannsóknir prógva, at føðitrot (ikki ovurveiði) førdi til fiskafloysi 1989-93 og at føðimeingi mi (meir enn gýting og friðing) hava stórfjølgað fiskastovnarnar.

2. Ætið er tvífaldað, og fiskurin fleirfaldaður í nøgd frá 1990 til í ár.

3. Fiskurin vigar 50% meir nú enn fyri 5 árum síðan, so at 20.000 tons av toskaveiði í ár svarar til

bert 13.000 tons eitt rakár. (Tað sama hýsan).

4. Friðingin av Føroya Banka í 6 ár hevur bert ført til lækkandi MLV-tilmæli frá fiskifrøðingum og prógvar, at fanatisk friðing í sjálvum sær er útlitsleys.

5. At gýtingarstovnurin, smbr. yvirlitstrolingini hjá Magnusi Heinasyni, nú er 82.000 tons av toski. Hitt mesta síðan rokárið 1983 og 10 ferðir so nógv sum fyri 5 árum síðan. Tá var full veiðiorka inni í fiskiskapinum, og tá rópti Fiskirannsóknarstovan varskó við grundgeving í yvirlitstrolingini hjá Magnusi Heinasyni. Tað løgna er, at Fiskirannróknarstovan í ár als ikki hevur tikið yvirlitstrolingina við í sínar grundgevingar fyri einum óneyðuga lágum MLV.

Minnilutin (John Petersen) setir tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

Í § 1 verður "Toskur á Føroya Banka 500" broytt til "Toskur á Føroya Banka 1.000",	Toskur á landgrunninum 10.000" broytt til "Toskur á landgrunninum 19.500", "Hýsa 10.000" broytt til "Hýsa 14.300", "Upsi 39.000" broytt til "Upsi 37.500" og "Kongafiskur 10.000" broytt til "Kongafiskur 13.500".

Minnilutin (Heini O. Heinesen) førir fram: Tá uppskotið um broyting í lógini um vinnuligan fiskiskap var til viðgerðar í undanfarnu tingsetu, var ikki semja í samgonguni um eykakvotur uppá 3500 tons av toski, sum landsstýrið skeyt upp. Flestu samgongutingmenn mæltu til eina væl hægri kvotu. Minnilutin (Heini O. Heinesen) lók tá undir við at hækka uppskot landsstýrisins við 500 tonsum. Hetta helt minnilutin (Heini O. Heinesen) vera forsvarligt, um kunngerðin um tey trolfríu økini kom við í lógina um vinnuligan fiskiskap, men fall hetta uppskot.

Landsstýrið legði sítt støði fyri kvotunum fyri komandi kvotuár við uppskoti sínum, tá tað mælti til at hækka toskakvotuna við 3.500 tonsum til 12.000 tons. Tað kann tykjast ørkymlandi, at landsstýrið innanfyri 6 vikur nú skýtur upp at læka kvotuna við 2.000 tonsum. Út frá hesum støðuleysa politikki landsstýrisins og tá tað ikki er gjørligt at fáa kunngerðina um trolfríu økini inn í lógina um vinnuligan fiskiskap, kann minnilutin (Heini O. Heinesen) ikki taka undir við uppskoti landsstýrisins og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Jákup Olsen) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins og vísir til, at Kr.F ongantíð hevur tikið undir við kvotulógini og heldur ikki ger tað nú. Ístaðin mæla vit til eina skipan við tekniskum reguleringum, sum vinnan eisini hevur víst á, so sum friðingum, legudøgum sum t.d. hvíld statnu- og halgidagar, skipan við fiskidagatali og skipan við avmarkaðum tali av størri skipum, ið kunnu fiska á djúpri vatni.

2. viðgerð 4. august 1995. Broytingaruppskot minnilutans (J. Petersen) fall við 6-17-1 atkvøðum. Uppskot landsstýrisins samtykt við 17-1-6 atkvøðum.

3. viðgerð 7. august 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 14-4-2 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 124 frá 8. august 1995.

3 Hernaðarmálið

Ár 1995, mánadagin 7. august legði Finnbogi Ísakson, løgtingsmaður, vegna tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

UPPSKOT
til
samtyktar.

Løgtingið heitir á Landsstýrið

1) **- um at krevja av donsku stjórnini, at hon uttan drál flýggjar føroyskum myndugleikum øll skjøl viðvíkjandi støðunum í Mjørkadali, á Sornfelli, á Eiði og í Suðuroy.**
2) **- um at krevja av donsku stjórnini, at hon greitt svarar teimum spurningum, sum løgmaður setti um hernaðarmálið í skrivi til uttanríkisráðharran, dagfest 7. juli 1995.**
3) **- um í eitt stytri tíðarskeið at seta ein søgufrøðlug at granska skjøl í skjalasavninum hjá stjórnini í USA við tí endamáli at útvega upplýsingar um amerikansk hernaðartiltøk í Føroyum.**

Viðmerkingar.

7. juli 1995 sendi Finnbogi Ísakson løgtingsmaður Edmundi Joensen løgmanni soljóðandi bræv:

"Hesar seinastu dagarnar eru sera álvarsligar og ódámligar upplýsingar komnar fram um ta villleiðing, sum danska stjórnin í mong ár hevur framt móti dønum, føroyingum og grønlendingum um kjarnorkupolitikk Danmarkar.

Síðani 1957 hevur stjórnin mótvegis almenninginum hildið fast við, at ikki var loyvt at goyma kjarnorkuvápn á danskari jørð, og ikki var loyvt kjarnorkuløddum flogførum at flúgva yvir danskari jørð. Nú hevur stjórnin váttað, at longu í 1957 fingu amerikanarar loyvi at flúgva yvir Grønlandi við kjarnorkuløddum flogførum og loyvi at goyma kjarnorkuvápn í Grønlandi. Grønlendingar vistu av ongum.

Løgtingið hevur gjørt fleiri samtyktir í hernaðarmálinum, sum eru verdar at taka fram aftur nú. 19. august 1970 samtykti Løgtingið:

"Føroya Løgting biður landsstýrið siga ríkisstjórnini frá, at tað sambært løgtingsviðtøku frá 13. apríl 1940 er løgtingsins støða, at Føroyar verða bildnar uttan fyri ósemjur landanna millum og hermálsligar samgongur, og at løgtingið sambært løgtingsmál nr. 14/1960 mótmælir, at hermenn verða knýttir at Sornfellis- ella Eiðisstøðini og noktar fyri, at krígsútgerð verður goymd á føroyskum land- ella sjóøki.

Landsstýrið verður samstundis biðið heita á ríkisstjórnina um at kanna líkindini nú at seta hesar løgtingsviðtøkur í verk.

Úrslitið av hesi kannan verður at leggja fyri løgtingið í vetrartingsetuni 1970/71."

Einasta svarið frá ríkisstjórnini var, at uttanríkis- og verjupolitikkur vóru ríkismál.
24. februar 1984 samtykti Løgtingið:

"Í samtjóði við samtykt løgtingsins 19. august 1970 um, at Føroyar skulu haldast uttan fyri ósemjur landanna millum, og at sýtt verður fyri, at stríðsútgerð verður goymd á føroyskum øki, lýsir løgtingið Føroyar at vera kjarnorkuvápnafrítt øki."

Tað hevur sum kunnugt verið líka torført hjá føroyingum sum grønlendingum at fáa upplýsingar um hernaðarpolitikkin. Í mong ár varð td. upplýst, at Loranstøðin á Eiði varð bert nýtt til sivila flogferðslu og herskip

og -flogfør, sum ikki høvdu kjarnorkulødingar. Seinni – í 70-árunum – fekk táverandi løgmaður tó váttað, at eisini teir kjarnorkulødku Polaris-kavbátarnir nýttu Loransstøðina á Eiði til navigasjón.

Eg baldi, at føroyingar eiga - eins og grønlendingar nú - at fáa allar upplýsingar um hershøðirnar í Mjørkadali, á Sornfelli, á Eiði og í Suðuroy (á Skálavnesi) og allar upplýsingar um danska kjarnorkupolitikkin í Føroyum.

Í hesum sambandi fari eg at minna á, at í apríl mánaði 1991 viðgjørdi byggi- og býarskipanarnevndin í Tórshavnar Býráð eina umsókn frá Forsvarets Bygningtjeneste um loyvi at sprongja ein 26 metra langan tunnil inn í fjallið uppi á Sornfelli. Byggi- og býarskipanarnevndin gav loyvi.

31. mai 1991 gav Friðingarnevndin fyri Streymoyar Sýslu loyvi, og 8. august 1991 varð umsóknin eisini játtað í Yvirfriðingarnevndini.

Tunnilin skuldi brúkast at goyma konteynarar í, varð sagt. Onki varð sagt um, hvat skuldi vera í konteynarunum. Tað er illa hugsandi, at vanligt burturkast verður goymt á henda hátt. Neyvan kann eftanin hava verið at goymt skermarnar á Sornfelli í tundinum, tí teir eru jú seldir til upphøggingar.

Eg fari tí at beita á teg um alt fyri eitt at leggja trýst á donsku stjórnina fyri at fáa ma. hesar upplýsingar til vega:

1) Hava NATO- ella amerikansk kjarnorkulødd flogfør havt ella hava tey loyvi at flúgva yvir føroyskum land- og sjóøki.

2) Hava NATO ella USA havt ella hava tey loyvi at goyma kjarnorkuvápn á føroyskum land- ella sjóøki.

3) Hava kjarnorkulødd herskip vitjað føroyska havn.

4) Er omanfyrinevndi tunnil sprongdur, er hann brúktur, og hvat er hann brúktur til, herundir hvat var í ella ætlað at vera í nevndu konteynarum.

At eg sendi tær hetta brev nú kemst av, at danska stjórnin er illa kroyst í sambandi við Thule-málið, og tí síggi eg ein møguleika fyri at fáa eitt eftirfarandi svar frá stjórnini júst nú. Eg haldi tað ikki vera ráðligt at bíða við hesum máli, til Løgtingið er komið saman á ólavsøku.

Vónandi gert tú, tað tú kanst, við hetta álvarsmál."

Løgmaður sendi utanríkisráðharranum spurningarnar 7. juli 1995. Svar kom frá Niels Helveg Petersen utanríkisráðharra, dagfest 18. juli 1995 (viðlagt sum skjal). Utanríkisráðharrin svaraði ikki spurningunum hvør sær, men vísti bert á, at í mong ár hevði tað verið danskur politikkur, at kjarnorkuvápn mátti ikki vera á donskum øki.

Svarið var ikki nøktandi, og tí verður hetta uppskot lagt fyri Løgtingið.

1. viðgerð 22. apríl 1996. Málið varð beint í uttanlandsnevndina, sum 8. mai 1996 legði fram soljóðandi

Átit

Uttanlandsnevndin hevur viðgjørt málið, sum jóðveldisflokkurin hevur lagt fram um at heita á landsstýrið at venda sær til donsku stjórnina til tess at fáa svarað ymsum spurningum um hernaðarmál í Føroyum, og

hevur nevndin býtt seg í 4 minnilutar.

Minnilutin (Jógvan Durhuus, Ingeborg Vinther og Jenis av Rana) tekur undir við málinum.

Ein minniluti (Atli Hansen) tekur ikki undir við málinum.

Ein annar minniluti (Helena Dam á Neystabø og Marita Petersen) tekur undir við punkt 1 og punkt 2 í málinum við teirri grundgeving, at minnilutin metir ikki, at spurningarnir, sum løgmaður hevur sett donsku stjórnini um hernaðarmálið, eru nóg væl svaraðir. Sami minniluti tekur sum so eisini undir við punkt 3, men ger vart við, at tað krevst ein meting av, hvørjar útreiðslurnar vera av at seta ein søgufrøðing at granska nevndu skjøl, og at ein játtan til endamálið er ein fortreyt fyri at samtykkja punkt 3. Minnilutin setir tí fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot til samtyktar

3) - um í eitt stytri tíðarskeið at seta ein søgufrøðing at granska skjøl í skjalasavninum hjá stjórnini í USA við tí endamáli at útvega upplýsingar um amerikansk hernaðartiltøk í Føroyum, um so er, at fíggjarorka er tøk til endamálið. Er fíggjarorka ikki tøk, heitir løgtingið á landsstýrið at leggja málið aftur fyri tingið í sambandi við fíggjarløgtingslógina fyri 1997.

Minnilutin (Bjarni Djurholm) førir fram fylgjandi: Fólkaflokkurin fekk rætt í spurninginum um kalda kríggið, meðan uppskotsstillarin fór skeivur. Tí tekur Fólkaflokkurin undir við hesum uppskoti í heilt øðrum anda, enn tað er sett fram í. Fólkaflokkurin ásannar nevniliga, at politiskt frælsi krevur sín rímiliga prís, og henda prís má hvør borgari vera sinnaður at gjalda.

Fólkaflokkurin hevur annars á fólkatingi sett forsætisráðharranum líknandi spurningar sum løgmaður og fingið líka ullint svar, men tað var áðrenn avdúkingarnar um Thule. Tíðin er komin til, at løgtingið fær greitt at vita, um tað kann skjalprógvast, at Danmark hevur spart pening til hernaðarútreiðslur við at leggja føroysku støðirnar til NATO-verjuna, sum vóru við til at tryggja Føroyum frælsið móti Sovjet frá 1949 fram til 1991. Eisini eigur løgtingið at fáa at vita, hvussu stórar hesar sparingar hava verið. (Danmark hevur rindað 40 mia.kr. minni enn t.d. Noreg farnu 45 árini).

Broytingaruppskot verður sett fram samsvarandi hesum.

Er Danmark sloppið lættari í hernaðarútreiðslum, man Grønlnd tó hava vigað nógv tyngri enn Føroyar í strategisku hugsanini hjá NATO. Men kortini eiga vit at fáa staðfest, um Danmark hevur spart meiri pening í verjuútreiðslum av føroysku støðunum, enn Danmark hevur latið almenna sektorinum í Føroyum í rakstrartskoyti millum ár og dag.

Møguligar danskar sparingar eiga at koma við inn í myndina, at fíggjarliga uppgerðin við Danmark, sum Fólkaflokkurin hevur arbeitt fyri, verður gjørd.

Vlðvíkjandi punkti 3, at seta ein søgufrøðing at granska amerikansk skjøl, er Fólkaflokkurin meiri ivasamur. Fyri minnilutan hevur tað avgerandi týdning at tann, ið settur verður at granska, hevur støði í objektivarl støðutøku og ikki ger kanningararbeiðið í áhuganum í at gera USA til syndabukk og Sovjet til halgimenni í kalda krígnum.

Vísandi til framførdu viðmerkingar, setir minnilutin fram soljóðandi

Broytingaruppskot

til

uppskotið til samtyktar

4) - løgtingið heitir á landsstýrið um at løgtingið fær greitt at vita, um tað kann skjalprógvast,

a - at Danmark hevur spart pening til hernaðarútreiðslur við at leggja føroysku støðirnar til NATO-verjuna, sum vóru við til at tryggja Føroyum frælsið móti Sovjet frá 1949 fram til 1991,

b - hvussu stórar hesar sparingar hava verið?

2. viðgerð 13. mai 1996. Finnbogi Ísakson, løgtingsmaður, legið vegna seg sjálvan og løgtingsmenninar Signar á Brúnni, Heina O. Heinesen og Jógvan Durhuus fram soljóðandi

Broytingaruppskot

Sum nýtt pkt. 4 verður sett:

" - um at krevja eina gjølfiga frágreiðing frá stjórnini um, hvussu herstøðirnar í Føroyum hava verið mótroknaðar í donskum verjuútreiðslum."

Viðmerkingar.

Hetta seinasta árið hevur fleiri ferðir verið havt frammi, at Danmark hevur spart munandi verjuútreiðslur, tí at herstøðir hava verið í Føroyum og Grønlandi. Hetta sjónarmið er ikki ókent í Danmark heldur. Sum dømi kunnu nevnast triggjar greinar í blaðnum Politiken 1. juli 1995.

Í oddagrein skrivaði blaðið:

"Samtidig er Danmark et af de lande, der gennem årene har anvendt færrest midler på sit forsvar og dermed ydet mindst til det fælles forsvar. H.C. Hansen har som mange andre set forsvarsaftalerne om Grønland som en vigtig dansk modydelse."

Í sama blaði hevði Rune Bech samrøðu við Poul Villaume á universitetinum í Keypmannahavn. Hann er leiðandi danskur granskari í Kalda Krígnum. Í samrøðuni varð skrivað:

"Hun mener også H.C.'s Grønlandspolitik var med til at sikre Danmark et uforholdsmæssigt billigt medlemsskab af NATO, da Grønland spillede en stor rolle for dansk sikkerhedspolitik."

Í einari "Analyse" skrivaði Ib Faulty í Politiken henda sama 1. juli, at avgerðin hjá forsætisráðharranum í 1957 skal skiljast út frá tí, at eftir uppreisturin í Ungarn í 1956 leikaði Kalda Krígið harðast á:

"Danmark havde brug for den amerikanske sikkerheds-garanti, men hørte ikke til de store bidragydere i NATO.

De amerikanske baser i Grønland - og især Thule-basen - var Danmarks måske væsentligste bidrag til det vestlige forsvar."

Skotið verður tí upp, at eisini hesin spurningurin verður kannaður.

Broytingaruppskot frá minnilutanum Bjarna Djurholm fekk 9-2-16 atkvøður og fall. Broytingaruppskot frá tjóðveldisflokkinum varð samtykt við 16-0-12 atkvøðum. Broytingaruppskot frá minnilutanum Helenu Dam á Neystabø og Maritu Petersen varð samtykt við 14-4-10 atkvøðum. Uppskot tjóðveldisfloksins soleiðis broytt endaliga samtykt við 16-4-8 atkvøðum.

4 Grannskoðan av almennum roknskapum.
1 Roknskapir Landskassans fyri árini 1989-91.

Ár 1995, mánadagin 27. november legði Atli Hansen vegna løgtingsgrannskoðararnar fram søljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapirnar hjá Landskassanum fyri fíggjarárini 1989-1991 við niðanfyristandandi viðmerkingum.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

Vísandi til løgtingsmál nr. 47/15 1993 løgdu løgtingsgrannskoðararnir við álitti dagfest 20. apríl 1994 roknskapir landskassans fyri fíggjarárini 1989-1991 fyri løgtingið til góðkenningar. Hetta uppskot til samtyktar fekk bert ta einu viðgerðina, m.a. tí at tingið fór heim í sambandi við, at val varð útskrivað, og uppskotið datt tí burtur.

Nývalda løgtingið valdi ikki nýggjar løgtingsgrannskoðarar fyrr enn í mei mánað 1995. Nývaldu løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið roknskapirnar, álitið frá undanfarnu løgtingsgrannskoðarunum og grannskoðanarfrágreiðingina frá grannskoðanardeild landskassans fyri 1989-1991.

Løgtingsgrannskoðararnir taka undir við tí, ið fort verður fram í álitinum frá undanfarnu løgtingsgrannskoðarunum, og hava tí valt at leggja álitið aftur fyri tingið í so at siga óbroyttum líki, burtursæð frá ávísum dagføringum og seinasta broti í álitinum, har undanfarnu løgtingsgrannskoðararnir mæltu til at áleggja løgmanni at gera eina meting av, í hvønn mun ein møgulig ábyrgd í ávísum málum eigur at staðfestast. Hetta brotið er strikað vísandi til, at løgtingið tann 1. juni 1995 samtykti uppskot til samtyktar frá rættarnevndini um at seta eina tingnevnd, sum við stoði í teimum málum og bendingum, sum m.a. eru lýstar í løgtings- og landsgrannskoðanarfrágreiðingunum frá 1980 og frameftir, skal geva eina frágreiðing, sum verður løgd fyri løgtingið til støðutakan.

1. Lógargrundarlag, roknskapar- og fíggjarviðurskifti:

Í frágreiðingini í landsroknskapinum fyri 1991 verður m.a. víst á, at sambært stýrisskipanarlógini skal ársroknskapurin gerast fyri virksemi landskassans. Roknskapurin skal, sambært lóg um grannskoðan av landsins almennu roknskapum, innan 8 mánaðir aftaná, at fíggjarárið er lokið, sendast løgtingsgrannskoðarunum, sum í seinasta lagi 16 mánaðir aftaná vera at gera álit um roknskapin og leggja hann fyri tingið til samtyktar.

Fyri tíðarskeiðið 1989-1991 hava hesar reglur verið galdandi:

Viðvíkjandi inntøkum, útreiðslum og lántøku eru hesar ásetingar í L.l. nr. 1 frá 13. mei 1948 um stýrisskipan Føroya í sermálum:

§ 19: *»Ongin skattur má verða álagdur, broyttur ella avtikin uttan við løgtingslóg. Lán, ið skuldbindur Løgtingið, má ikki verða tikið, og má heldur ikki søla ella onnur latan av hendi av fastogtum landsins ella nýtslurættí teirra fara fram uttan samsvarandi løgtingslóg.«*

§ 21: *»Áðrenn fíggjarlóg ella bráðfeingis fíggjarlóg er samtykt á Løgtingi, má skattur ikki verða kravdur.*
Ongin útreiðsla má verða goldin, ið ikki er heimilað í fíggjarlóg, galdandi, tá ið útreiðslan verður ávíst, ella í aðrari galdandi heimildarlóg. Tær játtanir, ið eru ásettar í fíggjarlóg ella aðrari heimildarlóg, mega bert verða goldnar í tí fíggjarári, sum fíggjarlógin er galdandi. Tó kann landsstýrið í tíðarskeiði inntil 3 mánaðir, aftan á fíggjarárið er endað ávísa pening, ið er játtaður á fíggjarlógini fyri árið, ið fór.«

Nevnast kann, at fíggjarnevndin í álitinum til fíggjarlógina fyri 1991 vísti til ásettu reglurnar fyri fíggjarárið 1990 og boðaði frá, at fyri játtanirnar til umsitingarrakstrarstøð vóru hesar høvuðsreglur:

»Fyri játtanirnar til umsitingarrakstrarstøð eru eins og fyri fíggjarárið 1990 hesar høvuðsreglur:

1. *Játtanin er ein blokkur til rakstrarstaðið*
2. *Játtaðar ásettar normeringar kunnu ikki setast uttan við loyvi frá landsstýrinum, og treytað av at stovnurin kann halda seg innanfyri samlaðu játtanina til stovnin.*
3. *Ongin nýnormering verður játtað uttan loyvi frá fíggjarnevnd løgtingsins.*
4. *Tað er ábyrgd stovnsleiðaranna at syrgja fyri at givnar játtanir verða hildnar. Um – sum undantøk vegna t.d. broyttar fortreytir – ein játtan ikki kemur at halda, er tað skylda stovnsleiðaranna at siga landsstýrinum frá hesum. Landsstýrið vil so samant við fíggjarnevndini taka neyðug stig.*
5. *Broyting av leigumálum og EDV skipanunum, leasing v.m. kann bert fremjast innan galdandi játtan og við loyvi frá landsstýrinum.«*

Í L.l. nr. 2 frá 13. mei 1948 um umboðsvald Føroya er í § 9 ásett, at:

»hvør landsstýrismaður hevur yvir fyri Løgtinginum ábyrgd av at røkja tað umboðsvald og ta umsitan, sum teinum er latin upp í hendur, beint og forsvarliga.
Umboðanina av teinum økjum, ið eru undir landsstýrisins ræði, býta landsstýrismenn sín ámillum.
Løgmaður ávísir allar útreiðslur úr kassa landsins og ansar, at hesar útreiðslur eru ikki størri enn tær játtanir, sum tingið hevur samtykt.«

Við heimild í hesi lóg eru reglur viðvíkjandi ávísing av útreiðslum úr landskassanum ásettar í reglugerð landsstýrisins frá 12. januar 1990.

Tað er ikki í lóggávu ella á annan hátt nærri ásett, hvussu landsroknskapurin skal uppsetast, hvørjir stovnar skulu takast við, og hvørjar upplýsingar skulu vera við, eins og tað heldur ikki eru ásett beinleiðis krøv um reglugerðir og fyriskipanir fyri almennar stovnar, harundir lýsing av uppgávum, endamáli og skráseringum hesum viðvíkjandi.

Sambært § 12 í L.l. nr. 2 er tað skylda landsstýrisins:

»at ansa, at ongar útreiðslur verða goldnar, sum ikki hava heimild í fíggjarlóg, ið er galdandi, tá ávísan fer fram, ella í aðrari galdandi heimildarlóg. Tær játtanir, sum eru ásettar við fíggjarlóg ella aðrari heimildarlóg, kunnu bert verða goldnar í tí fíggjarári, tá fíggjarlógin er galdandi, eins og yvirflytan frá einum posti til annan ikki kann fara fram uttan greiniliga heimild til hetta í lógini. Landsstýrið hevur tó heimild til í einum tíðarskeiði av inntil 3 mánaðir, aftan á at fíggjarárið er lokið, at ávísa pening, sum er játtaður í fíggjarlógini fyri farna árið.«

Endamálið við grannskoðanini hjá løgtingsgrannskoðarunum er ásett í § 3 í Ll. nr. 16 frá 26. apríl 1965 um grannskoðan av landsins almennu roknskapum.:

»Løgtingsgrannskoðararnir fara ígjøgnum hvørt árs roknskapir og ansa eftir, at allar inntøkur og útreiðslur eru komnar við inn í roknskapin og hereftir, at ongin útreiðsla í landskassarokuskapinum er hildin, sum hevur ikki heimild í fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg.

Løgtingsgrannskoðararnir skulu hava eyguni eftir, at tað hevur verið forsvarliga húsað í fyrisitingini av midlum landsins og virkjum tess.«

Í § 4 er ásett, at:

»fyri heinleikan av tí, sum í roknskapinum stendur, hava løgtingsgrannskoðararnir rætt til at taka váttanir o.t. frá roknskapargrannskoðanini sum nóg gott prógv.«

2. *Yvirlit yvir rakstur 1989-1991:*

(mió.kr.)

	1989		1990		1991		
	Roknsk.	F-lóg	Roknsk.	F-lóg	Roknsk.	F-lóg	Eyka F-lóg
INNTØKUR:							
§ 1 Skattir	**1.281**	*1.310*	**1.144**	*1.220*	**988**	*1.050*	*1.050*
§ 2 Toll- og framleiðslugjøld	**957**	*1.108*	**785**	*1.003*	**762**	*803*	*768*
§ 3 Onnur gjøld	**17**	*12*	**14**	*16*	**4**	*2*	*3*
§ 4 Inntøkur av spæli	**1**	*1*	**1**	*1*	**1**	*1*	*1*
§ 5 Rentur & vinningsbýti v.m.	**÷ 33**	*3*	**÷ 121**	*÷ 42*	**÷ 130**	*÷ 108*	*÷ 126*
§ 6 Landsstovnar	**÷ 58**	*÷ 42*	**÷ 78**	*÷ 44*	**0**	*22*	*0*
§ 7 Partur av ovlopi Danska Tjóðbankans	**21**	*15*	**0**	*20*	**34**	*20*	*20*
§ 8 Gjøld frá danska statinum	**730**	*749*	**752**	*764*	**771**	*785*	*785*
§ 9 Ymsar inntøkur	**-**	*-*	**-**	*-*	**3**	*1*	*1*
Samantaldar inntøkur	**2.916**	*3.156*	**2.497**	*2.938*	**2.433**	*2.576*	*2.502*
ÚTREIÐSLUR							
§ 10 Løgtingið	**16**	*15*	**16**	*16*	**17**	*15*	*16*
§ 11 Landsumsitingin	**160**	*157*	**152**	*149*	**169**	*155*	*169*
§ 12 Heilsumál	**411**	*401*	**359**	*354*	**361**	*349*	*356*
§ 13 Samferðslumál	**317**	*315*	**289**	*267*	**386**	*376*	*383*
§ 14 Skúlamál	**426**	*422*	**391**	*380*	**386**	*378*	*391*
§ 15 Vísind, bókmentir og list	**124**	*123*	**85**	*85*	**59**	*59*	*62*
§ 16 Fiskivinna, sigling o.t.	**601**	*425*	**547**	*536*	**539**	*522*	*526*
§ 17 Landbúnaður og matrikulering	**53**	*51*	**45**	*45*	**36**	*36*	*36*
§ 18 Handil, ídnaður v.m.	**52**	*50*	**46**	*43*	**47**	*48*	*48*
§ 19 Almannamál v.m.	**900**	*821*	**853**	*791*	**800**	*806*	*785*
§ 20 Pensjónsútreiðslur	**9**	*5*	**10**	*8*	**11**	*10*	*11*

§ 21 Effektivar veðhaldsbindingar	**105**	*105*	**80**	*80*	**167**	*170*	*170*
§ 22 Aðrar og óvissar útreiðslur	**6**	*6*	**7**	*6*	**7**	*7*	*7*
§ 23 At leggja í ymsar grunnar v.m.	**120**	*146*	**99**	*106*	**0**	*0*	*0*
§ 24 Burturleggingar til avdráttir av lánum	**5**	*4*	**0**	*4*	**0**	*0*	*0*
§ 25 Avskrivingar	**52**	*54*	**37**	*38*	**0**	*0*	*0*
§ 26 Ymsar ognarútreiðslur	**-**	*1*	**-**	*1*	**-**	*1*	*1*
§ 27 Reguleringskonto	**0**	*50*	**0**	*30*	**20**	*0*	*20*
Samantaldar útreiðslur	**3.357**	*3.151*	**3.016**	*2.939*	**3.005**	*2.932*	*2.981*
Rakstrarundirskot	**÷ 441**	*+ 5*	**÷ 519**	*÷ 1*	**÷ 572**	*÷ 356*	*÷ 479*

3. *Yvirlit yvir gongd í fíggjarstøðuni 1989-1991:*

Fíggjarstøðan í landskassarokninskapunum til og við 1990 gevur ikki eina greiða og fullfíggjaða mynd m.a. orsakað av, at ein stórur partur av lánum, innistandandi í peningastovnum, útlánum, veðhaldsútleggum v.m. vóru skrásett í teim nógvu grunnunum. Hin stóri partur av hesum útlánum og veðhaldsútleggum vóru harumframt virðisleys. Vísandi til landskassarokninskapin fyri 1991 varð mett, at setast skuldu 1,4 mia.kr. av móti tapt av landskassaútlánum, veðhaldsútleggum v.m., og at umleið 200 mió.kr. av skattaeftirstøðunum vóru virðisleysar.

Vísandi til omanfyristandandi ber tí ikki til at gera eitt greitt yvirlit yvir gongdina í fíggjarstøðuni, so sum hon er uppsett í landskassarokninskapunum áðrenn 1991.

Niðanfyri er gjørt eitt yvirlit, sum vísir innistandandi og skuld. íroknað grunnar, fyri árini 1987-1991:

(mió.kr.)

	1987	1988	1989	1990	1991
Innistandandi (íroknað grunnar)	406	369	366	391	239
Lán (íroknað grunnar og tvungna uppsparing)	÷ 437	÷ 493	÷ 1.018	÷ 1.584	÷ 2.163
Nettoogn/-skuld	+ 29	÷ 124	÷ 652	÷ 1.193	÷ 1.924
Skrásettar veðhaldsskyldur	2.379	2.251	2.186	2.119	1.661

Ultimo 1987 var talan var um eina nettoogn excl. veðhaldsskyldur, sum tá vóru skrásettar til uml. 2,4 mia.kr.

Frá 1987-1991 vaks nettoskuld landskassans til umleið 2 mia.kr., men í hesum tíðarskeiði minkaði veðhaldsskyldur landskassans við umleið 0,7 mia.kr., vegna tess, at landskassin í hesum tíðarskeiði hevur útgoldið munandi upphæddir av tí at veðhald gjørdust effektiv.

Nevnast skal tó, at skrásetta veðhaldsskyldur landskassans í stóran mun ikki hevur verið eftirfarandi øll árini. Frá tí at tilsøgn um veðhald varð givin, og til landsstýrið undirskrivaði árit um landskassaveðhald á skuldarbrovini, gingu ofta fleiri ár, og í fleiri førum fekk gjaldstovan tá ikki boð um at skrásetta veittu veðhaldini í veðhaldsyvirlitið.

Mett verður, at avtøkan av grunnunum, virðismetingin av aktivum og uppsetingin av fíggjarstøðuni í landskassarokninskapunum fyri 1991 við notum og viðmerkingum geva rokniskaparlesarum eina greiðari og meira fullfíggjaða mynd av fíggjarstøðuni í mun til undanfarin ár.

4. *Seinasta álit løgtingsgrannskoðaranna:*

Í sambandi við, at landskassarokskapirnir fyri 1985-1988 vórðu lagdir fyri løgtingið til góðkenningar, samtykti løgtingið 22. desember 1992 uppskot til samtyktar frá løgtingsgrannskoðarunum daglest 9. apríl 1992 við hesum viðmerkingum:

1. Løgtingsgrannskoðararnir ásanna, at teir sjálvir ikki hava verið nóg aktivir á grannskoðanarøkinum seinastu áritni, og áttu at fylgt tí arbeiðnum betri upp, ið gjørt varð. Tískil fá nógv arbeiði hjá nevndini viðurfyri.

   Í 1992 beiddi fíggjarnevndin á løgtingsgrannskoðararnar um at viðgera eina umskipan av grannskoðanini av teim almennu rokskapunum og lata formansskapi løgtingsins álit.

   Í mars 1993 lótu løgtingsgrannskoðararnir formansskapi løgtingsins álit viðvíkjandi grannskoðanini av tí almenna virksemnum. Mælt varð til at umskipa grannskoðanina við lóg, við tí tilsvarandi danska lógargrundarlagnum sum fyrimynd.

   Formansskapurin legði lógaruppskotini fyri tingið, og vórðu tey beind í fíggjarnevndina. Av tí at løgtingsval varð útskrivað, eru lógaruppskotini síðani burturdottin. Nývuldu løgtingsgrannskoðararnir vilja reisa spurningin av nýggjum í hesi tingsetu.

2. Áralað varð, at øll sitandi landsstýri síðani fíggjarárið 1982/83 ikki hava yvirhildið grein 21 í stýrisskipanarlógini, og ikki tikið stig til at fáa hesi viðurskifti í rettlag, hóast nógvar átalur og áheitanir. Eisini varð átalað, at landsstýrið í nógvum førum als ikki svarar fyrispurningum ella tekur sær tykni av viðmerkingum og áheitanum frá rokskapargrannskoðanini og frá løgtingsgrannskoðarunum og harvið eisini frá løgtinginum.

3. Fegnast varð um tey stig, sum eru tikin til at bøta um mannagongdina viðvíkjandi fíggjarviðurskiftunum, so sum gerð av eykafíggjarlóg í 1991, avtøka av teim flestu landskassagrunnunum og lóp nr. 116 frá 20. desember 1991 um heimild til lán/nýtslu (løgtingsmál nr. 39/1991).

4. Átalað varð, at landsstýrið ikki hevði sýnt neyðugt fíggjarligt umhugsni viðvíkjandi útláns- og veðhaldsvirksemi landsins. Í alt ov stóran mun hevði landsstýrið umsitið givin lán og veðhald uttan at fylgja nóg vel við og taka neyðug stig mótvegis lántakarum, ið ikki halda sínar skyldur. Hetta hevur munandi økt um landskassans tap og viðført stórar meirrentur og verið til skaða fyri og fordað eini menning av tí partinum av vinnuni, ið hevur royndt at bildið sínar skyldur og bygt á eitt umhugsað grundarlag.

5. Løgtingsgrannskoðararnir metti, at eitt stórt partur av aktivunum, ið stóðu í landskassarokskapunum, einki virði høvdu, og áløgdu landsstýrinum at taka stig til eina upprudding á hesum øki.

   Løgtingsgrannskoðararnir fegnast um, at landsstýrið í 1992 tók stig til eina virðismeting av hesum aktivum, og at árslitið er tikið við í landskassarokskapin fyri 1991.

6. Viðvíkjandi landskassarokskapinum varð álagt landsstýrinum at áseta grundleggjandi rokskaparprinsippir á lýðandi økjum, so sum avskrivingar/avsetingar móti tapi, virðismeting, veðhaldsskyldur, kurstap/vinning, bólking av status o.s.fr., og at hetta verður gjørt í samband við, at tað eisini verða ásettar nærri reglur fyri uppsetan av ársrokskapi hjá teim almennu stovnunum/grunnuntum.

   Løgtingsgrannskoðararnir fegnast um, at landsstýrið í 1993 legði fram uppskot um lóg um landsins almenna rokskaparhald v.m., sum nú er samtykt við gildi frá 1. januar 1995. Men lógin er bert 1. stig í hesum arbeiði.

   Samhert § 3 í lógini skal landsstýrið áseta reglur um rokskaparhald landsins. Í hesum sambandi kann landsstýrið umframt at áseta krøv um trygd og skipað viðurskifti innan rokskaparøkið, áseta krøv um útvegan av upplýsingum til nýtslu í sambandi við búskaparliga ráðlegging, stýring og eftirlit. Hóast lógin kom í gildi 1. januar 1995, eru enn ongar reglur ásettar.

Sambæt § 5 í lógini er álagt almennum stovnum v.m. at gera eina reglugerð um rokskaparhaldið, og skal henda reglugerð gerast samsvarandi reglum, sum verða ásettar av landsstýrinum. Heldur ikki hesar reglur eru ásettar.

Løgtingsgrannskoðararnir meta tað vera sera óheppið, at tílíkar grundleggjandi rokskaparreglur ikki eru ásettar.

Í hesum sambandi kann eisini vísast á, at reglugerð landsstýrisins frá 12. januar 1990 um útgjaldingar úr landskassanum er gjørd sambæt løgtingslóg nr. 2 frá 13. mei 1948 um umboðsvald Føroya. Henda lóg fór úr gildi ólavsøkudag 1995, tá nýggja stýrisskipanarlógin fekk gildi.

7. Mælt verð landsstýrinum til sum skjótast at taka stig til ein samskipaðan edv-politikk, har hugsað verður fleiri ár fram, og at staðin í tí sambandinum verður tikin til, hvussu framtíðar rokskaparhald og fíggjarstýring eigur at skipast, og hvussu bygnaðurin skal broytast.

Løgtingsgrannskoðararnir fegnast um, at landsstýrið hevur tikið stig til ein samskipaðan edv-politikk. Nógv kunningararbeiði er gjørt á hesum trupla øki, peningur er seinastu árini játtaður til eina nýggja fíggjarstýringarskipan, og nógv orka verður nú nýtt til at bøta um hesi viðurskifti.

8. Mælt verð landsstýrinum til at endurskoða og broyta kunngerðina um tollkreditt, so tapini á hesum øki framyvir gerast minni. Í hesum sambandi verð mælt til, at heimild verð givin tí at nokta at útflýggja vøru, fyrr enn gjaldkomin skuld til tollvaldið er goldin. Í sambandi við komandi MVG-skipan verð mælt til stórt varsemi og umhugsni viðvíkjandi kreditti og innkrevjing.

Hóast fleiri áheitanir, er kunngerðin um tollkreditt/innflutningsmvg-kreditt framvegis óbroytt.

5. *Rokskapargrannskoðanin/viðmerkingar:*

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið grannskoðanarfrágreiðingina frá Grannskoðanardeild Landskassans og løgtingsins statsautoriseraða grannskoðara fyri 1989-1991, og er henda viðlagd sum fylgiskjal til hetta løgtingsmál. Í sambandi við, at løgtingsgrannskoðararnir ikki áður hava fingið serligar frágreiðingar um gjøgnumgongd av veitum veðhaldum/veðhaldsútleggum, heitta løgtingsgrannskoðararnir á grannskoðanina um at leggja serligan dem á at grannskoða hetta øki, umfram serlán og upphøggingarstuðul.

Niðanfyristandandi verður í stuttum tikið saman um viðmerkingarnar frá rokskapargrannskoðanini:

1. Meirnýsfa
2. Skúlamál
3. Upphøggingarstuðul
4. Serlán
5. Almannamál
6. Lóg nr. 13/1967 um veðhald fyri prioritetslánum
7. Veðhald/veðhaldsútlegg fyri lánum til fiskiskip
8. Veðhald fyri lánum til flakavirkir
9. Veðhald fyri lánum til onnur virkir
10. Veðhald fyri lánum til kommunur
11. Veðhald fyri láni til P/F Atlantic Airways
12. Veðhald fyri lánum til IRF
13. Innkrevjing
14. Búskaparmiðið
15. Ymsir grunnar

I. Meirnýtsla:

Viðvíkjandi fíggjarárinum 1989 og 1990

Sambæt fíggjarløgtingslógini fyri **1989** varð mett, at talan fór at verða um eitt rakstraryvirskot uppá 5,7 mió.kr., men sambæt landskassarokskapinum gjørdist undirskotið 441 mió.kr., ein munur uppá 446 mió.kr.

Inntøkurnar vórðu 240 mió.kr. lægri enn mett.

Útreiðslurnar vórðu 206 mió.kr. hægri enn mett. § 21, effektivar veðhaldsbindingar, vísir eina nýtslu uppá 105 mió.kr., men skrásetta nettoveðhaldsútreiðslurnar í veðhaldsgrunninum vórðu 288 mió.kr., 183 mió.kr. hægri enn fíggjarlóg/rakstrarroknskapurin vísir.

Sambæt fíggjarløgtingslógini fyri **1990** varð mett, at talan fór at verða um eitt rakstrarundirskot uppá 0,6 mió.kr., men sambæt landskassarokskapinum gjørdist undirskotið 519 mió.kr.

Inntøkurnar vórðu 441 mió.kr. lægri enn mett.

Útreiðslurnar vórðu 77 mió.kr. hægri enn mett. § 21, effektivar veðhaldsbindingar, vísir eina nýtslu uppá 80 mió.kr., men skrásetta nettoveðhaldsútreiðslurnar í veðhaldsgrunninum vórðu 170 mió.kr., 90 mió.kr. hægri enn fíggjarlóg/rakstrarroknskapurin vísir.

Um meirnýtslan á § 21 verður tikin við, so er samlaða rakstrarundirskotið í fíggjarárinum 1989 og 1990 góðar 1,2 mia.kr. í mun til fíggjarløgtingslógirnar hesi bæði árini, sum so at siga javnvigaðu, tá tær vórðu samtyktar.

Í mun til árini frammanundan er meirnýtslan sum heild í 1989 og 1990 í teim nógvu grunnunum ikki so stór, burtursæð frá veðhaldsgrunninum, har meirnýtslan var 273 mió.kr.

Ikki allar eykajáttanir eru skrásettar í landskassarokskapinum. Grannskoðanin hevur gjøgnumgingið gerðabøkurnar hjá fíggjarnevndini og tær lógir í fíggjarárinum, sum viðvíkja eykajáttanum.

Í grannskoðanarfrágreiðingini er eitt yvirlit yvir bruttomeirnýtsluna í 1989 og 1990 í mun til játtan á fíggjarlóg og eykajáttanir frá fíggjarnevndini ella sambæt løgtingslógum fyri tey einstøku rakstrarstøðini. Fyri bæði fíggjarárini er talan um eina bruttomeirnýtslu uppá uml. 400 mió.kr. í alt.

Tær størstu meirnýtslurnar hesi bæði árini eru á hesum økjum:

	mió.kr.
– Almannamál	160
– Rentuútreiðslur	131
– Strandferðslan (fekk »eykajáttun« í 1991)	25
– Skúlamál	19
– Heilsumál	14

Viðvíkjandi skúlamálum kann nevnast, at tað, sum er skrásett sum nýtsla hjá teim tekniska skúlanum, ikki er tað, sum er brúkt sambæt ársroknskapinum hjá skúlanum tey einstøku árini.

Játtanarviðurskiftini í fiskivinnuøkinum eru nærri lýst í álitinum frá løgtingsgrannskoðarunum dagfest 16. februar 1994 um roknskapirnar hjá Lønjavningar- og Rálískagrunninum.

Viðvíkjandi fíggjarárinum 1991

Í 1991 verða játtanarviðurskiftini munandi broytt, flestu landskassagrunnurnir vórðu avtaknir og ein eyka fíggjarlóg varð samtykt fyri 1991.

Viðvíkjandi meir-/minninýtslu samanborið við játtan kann tí vísast til roknskapin fyri 1991, har roknskapartølini eru sett upp í mun til játtanirnar á eykafíggjarlógini fyri 1991.

Samlaðu inntøkurnar gjørdust 69 mió.kr. minni enn mett og útreiðslurnar 24 mió.kr. størri, netto.

Í mun til árini frammanundan eru frávikini í 1991 munandi minni. Tær størstu meirnýtslurnar viðvíkja almannamálum, fiskivinnu og sjúkrahúsverkinum.

Í sambandi við at landskassagrunnarnir vórðu avtiknir kann neynast sum víst í landskassaroknskapinum fyri 1991, at fram til 1990 høvdu hesir 4 grunnar havt ta størstu meirnýtsluna:

	(mió.kr.)
- Grunnur móti tapum av lánum og veðhaldum	290
- Grunnur til fiskiskipaupphøgging	48
Grunnur til berghol og brúgvagerð	34
- Grunnur til sjúkrahúsbygging	13

2. Skúlamál:

Viðvíkjandi **fólkaskúlanum** verður mett, at skipanin, sum nýtt verður at stýra fíggjarviðurskiftum fólkaskúlans, tykist vera væl umsitin. Mælt verður til at gjørdur verður ein samanskrivaður lønarsáttmáli. Gjørt verður vart við, at stórur vandi er fyri, at vanligt viðlíkahald av skúlunum í ávísum førum verður spart burtur, og hetta kann hava við sær munandi størri útreiðslur seinni. Somuleiðis tykist nógv spart uppá undirvísingartilfar, sum eisini er ein kommunal uppgáva.

Viðvíkjandi **Suðuroyar HF-skeið v.m.** verður víst á, at í skúlaárinum 1991-92 var talan um sera nógvar yvirtímar. Eins og viðvíkjandi **Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna og Føroya Sjómansskúla** varð mælt landsskúlafyrisitingini til at taka stig til at avklára ymsar smærri spurningar viðvíkjandi m.a. lønar-/og sáttmálaviðurskiftum, sum reistir vórðu.

3. Upphøggingarstuðul:

Upphøggingarstuðulin, sum varð veittur eftir reglugerð nr. 27 frá 3. mei 1988, var uppá 92 mió.kr. til 22 skip. Víst verður á, at henda skipan var sera trupul at umsita, og at stuðulin í fleiri førum ikki varð veittur í tráð við reglugerðina. Fleiri av teimum skipum, ið lingu upphøggingarstuðul, vóru ella vóru um at verða løgd av fíggjarligum og øðrum orsokum, og fiskiskapurin hevur m.a. tí í fleiri førum ikki verið tann heilt stóri, og upphøggingarstuðulin til fleiri av hesum skipum kostaði tí serliga nógv í mun til skip, ið høvdu verið í vanligum rakstri. Endamálið hjá landsstýrinum hevur tí helst verið at fáa aftur fiskiloyvi heldur enn at minka um veiðutrýstið í fyrstu atløgu.

Upphøggingarstuðul samb. løgtingslóg nr. 46 frá 30. mars 1990 varð veittur til 33 skip, sum lingu útgoldið ialt uml. 182 mió.kr. eftir hesi lóg. Henda upphøggingarskipan var munandi lættari at umsita, eftirsum stuðul varð veittur í mun til, hvussu nógv skipini høvdu fiskað seinastu árini. Grannskoðanin hevur uttan stórvegis viðmerkingar gjøgnumgingið nakrar av hesum útrokningum.

4. Serlán:

Løgtingslóg nr. 41 frá 21. mei 1988 um lán/serlán til fiskifør heimilar landsstýrinum saman við Fíggjarnevndini at nýta upp til 150 mió.kr. til at bøta um rakstrargrundarlagið hjá fiskiførum. 67 skip lingu í tíðarskeiðinum 1988-91 útgoldið ialt 125 mió.kr.

Sambært kunngerð nr. 48 frá 26. mei 1988 eru nærri treytir settar fyri lánsveiting eftir hesi lóg.

Sambært kunngerðini ger landsumsitingin tilmæli viðvíkjandi innkomnum umsóknum, og kann hon taka sær serkøna hjálp í viðgerðini. Til at málsviðgera serlánini varð sett ein serlig nevnd við umboðum frá fiskivinnuumsitingini, Lønjavningar- og Ídnaðargrunninum og P/F Føroya Banka.

Endamálið við grannskoðanini hevur verið at meta um, í hvønn mun lánini eru veitt til tað endamál og eftir teimum treytum, lð úsettar eru í lógini og í kunngerðini. 15 skip eru tilvildarliga vald út, og fyri hvørt skip er kannað eftir, um treytirnar fyri at fáa lán sambært lógini um serlán og kunngerðini eru uppfyltar.

Ein treyt í kunngerðini er, at umsøkjarin skal geva gjølligar upplýsingar um, hvussu raksturin kann gerast lønandi. Hesar upplýsingar eru bert í helmingunum av sakunum. Annars eru viðlagdar rakstraræetlanir, sum flestar eru uppsettar av grannskoðarum. Ivi kann vera um, hvussu realistiskt hesar eru uppsettar. Dømi eru tví- og trífalding av søluni við støðugum ella minkandi útreiðslum hóast økta veiðu.

Upplýst er, at serlánsnevndin ikki legði dent á hesar upplýsingar, sum teir mettu onki virði høvdu.

Har talan er um partafeløg, er ein treyt, at eginpeningurin skal hækkast við 10% av tí peningi, ið veittur verður sum serlán. Viðvíkjandi partsreiðarium og í øðrum førum verður kravt, at eginpeningurin verður hækkaður við 20% av veitta láninum.

Tá talan er um partafeløg, er kravd váttan frá umsøkjara ella banka um, at eginpeningurin er hækkaður, ella at banki váttar, at viðkomandi felag hevur inngoldið eina ávísa upphædd á bók í bankanum. Í fleiri førum er samsvarandi hækkan av partapeningi ikki síðani skrásett sambært partafelagskránni. Tá talan er um partsreiðarí e.l. er í tveimum førum inngoldið 10% ístaðin fyri 20%.

Fleiri av skipunum vóru sera illa fyri fíggjarliga við stórari lánibyrðu. Hóast ongar avskrivingar vóru gjørdar, var í nærum øllum førum talan um negativa eginogn umframt stóra gjaldkomna skuld. Men bert í einum føri er í roknskapinum tikið fyrivarni fyri framhaldandi rakstri.

Ein treyt í kunngerðini er, at grundarlag skal vera fyri at halda, at farið, við tí serláni sum verður veitt, verður ført fyri at bera seg fíggjarliga. Við at gjøgnumganga roknskapartilfarið hjá skipunum sæst, at fleiri av hesum longu tá neyvan høvdu nakran møguleika fyri at bera seg fíggjarliga, hóast hesi fingu serlán, og í tveimum førum hevur serlánsnevndin viðmælt umsóknir, sum Búskaparráðið stutt áðrenn hevði mælt frá at veita kreppulán/veðhald við tí grundgeving, at tað ikki var nakar møguleiki fyri at fáa skipini at bera seg fíggjarliga.

Við at kanna heildartilmælini sæst, at nøkur skip hava fingið útgoldið serlán, hóast serlánsnevndin hevur gjørt vart við, at »ongin vón« er fyri framhaldandi rakstri.

Nevnast kann, at í fíggjarnevndini var ynski um eisini at fáa øll tey mál, har tað var mett, »at ongin vón er fyri viðkomandi skipi«. Biðið varð seinni um, at øll mál viðvíkjandi serlánum komu fram til fíggjarnevndina, so nevndin kundi fáa trygd fyri eins viðgerð, og fíggjarnevndin játtaði síðani serlán til fleiri skip »uttan vón«.

5. Almannamál:

Ein av høvuðsniðurstøðunum í grannskoðanarfrágreiðingunum fyri 1990 og 1991 fyri tann partin av almannaútreiðslunum, har talan er um ríkisendurgjald, er, at arbeiðsorkan hæði í landsstýrinum og á Almannastovuni hevur verið ov iftil, og at ein stórur partur av trupulleikunum á almannaokinum óivað standast av hesum.

Í grannskoðanarfrágreiðingunum verður víst á, at grannskoðanin síðani heimastýrið yvirtók umsitingina av almannamálum ikki hevur verið nøktandi, og at ein partur av trupulleikunum standast av, at danskir og føroyskir myndugleikar m.a. av hesi orsøk ikki hava havt nóg gott innlit í umsitingina av hesum øki.

Mett verður, at høvuðstrupulleikin viðvíkjandi lógargrundarlagnum er, at skiftandi landsstýri ikki í nóg stóran mun hava tikið stig til neyðugar dagføringar av almannalóggávuni og m.a. ikki tikið stig til neyðuga samskipan við aðra lóggávu, harundir skatta- og skrásetingarlóggávu, og at Almannastovan tí hevur verið noydd at umsita út frá einum lógargrundarlagi, sum á nøkrum økjum ikki hevur verið tíðarhóskandi og á øðrum økjum í veruleikanum ógjørligt at umsita.

Sum frá er liðið, er á fleiri økjum vorðin alt størri munur millum lógarorðing og praksis. Viðmerkjast skal tó, at Almannastovan, tá mett hevur verið at innihaldið í galdandi lóggávu hevur verið ógreitt, í sumum førum hevur nýtt danskan praksis (t.d. bistandslovens vegleiðandi, og hevur Sosialmálaráðið í flestu av hesum førum eftirfylgjandi góðkent hetta. Henda støðan lykist tó heldur ósamberlig við endamálið hjá løgtinginum við at yvirtaka umsitingina.

Ein meginregla í verandi almannalóggávu er, at ognar- og inntøkuviðurskifti hjá viðskiftafólki eru avgerandi fyri støddina av almannaveitingunum.

Í eini frágreiðing frá Toll- og Skattstovu Føroya í okjober 1993 um kanning av ognaruppgerðini verður sagt frá, at gongdin viðvíkjandi ognaruppgerðum hevur verið tann, at sum frá leið vórðu tað minni enn helvtin av skattaborgarunum, ið sendu ognaruppgerðir inn, og at líkningarráðið í 1989 avgjørdi frá 1990 at rokna at krevja allar ognaruppgerðir inn. Við stuði í eini kanning í juni 1992 av 762 ognaruppgerðum, tilvildarliga valdar út, varð mett, at upplýsingar um innistandandi og skuld, sum Toll- og Skattstova Føroya fær frá peningastovnum, eru alt ov ófullfíggjaðir til, at stovnurin kann grunda sítt arbeiði á teir. Eisini noyðist stovnurin at taka fyrivarni fyri rettleikanum av teim ognarupplýsingum, stovnurin veitir Almannastovuni.

Nevnast kann í hesum sambandi, at ein arbeiðsbólkur, ið landsstýrið í september 1993 setti at endurskoða og gera tilmæli viðvíkjandi tillaging av ognar- og inntøkuupplýsingunum í skatta- og almannalóggávuni, í eini frágreiðing frá november 1993 vísti á so nógvar ivasparningar, at arbeiðsbólkurin skeyt upp, at seta ein annan skjóltarbeiðandi arbeiðsbólk at halda fram við hesum arbeiði, og at koma við uppskoti um broytingar í pensjónslógunum sum heild, við tí endamáli at fáa eina einfalda og nátúrligan pensjónslóggávu, sum kann umsitast við verandi starvsfólkataki. Grundgevingarnar fyri hesum vóru m.a., at lógirnar í verandi líki eru truplar, og í sumum førum nærum ómøguligar at umsita. Hetta kemst av, at tær 1) eru gamlar (frá 50-árunum) og tí ikki í øllum førum hóska til samfelagið í dag, 2) ongantíð hava verið fyri grundleggjandi endurskoðan, og 3) tíðum bert eru broyttar snávegis. Úrslitið er, at sosialu lógirnar ikki longur eru samanhangandi, hvørki sínámillum ella við aðrar lógir, eitt nú skattalógina. Somuleiðis varð heitt á landsstýrið um at taka støðu til ávísar grundleggjandi aðalreglur og endamál við eini nýggjari lóggávu.

Í grannskoðanarfrágreiðingunum fyri 1990 og 1991 varð mælt til eitt greiðari uppgávubýti millum landsstýrið og Almannastovuna. Í sambandi við yvirtøkuna av umsitingini varð í kunngerð nr. 5 frá 25. mars 1975 ásett, at Almannastovan skuldi hava tær uppgávur um hendi, sum vóru lagdar til »landsstyrets socialforvaltning«. Tað vil fyrst og fremst siga uppgávur í mun til viðskiftafólkið. Ásett varð, at aðrar uppgávur kunnu leggjast til Almannastovuna við lóg, løgtingslóg ella avgerð frá landsstýrinum, og at landsstýrið kann geta reglur fyri virkseminum hjá Almannastovuni. Slíkar reglur eru ikki gjordar, og tí er ikki greitt, í hvønn mun Almannastovan skal hava aðrar meira yvirordnaðar uppgávur (í sambandi við ráðlegging, fyrireiking av lóggávu v.m.). Tað má metast, at partur av teim umsitingarligu trupulleikunum standast av tí ógreiða uppbýti millum landsstýrið og Almannastovuna, og t.d. var hetta ógreiða uppgávu- og ábyrgdarbýti helst ein av orsøkunum til trupulleikarnar við at halda tær avtalur, ið vórðu gjordar við Sosialmálaráðið. Mælt er landsstýrinum til at greiða hesi viðurskifti, áðrenn støða verður tikin til broytingar í bygnaðinum á Almannastovuni.

6. Lóg nr. 13/1967 um veðhald fyri prioritetslánum:

Í sambandi við gjøgnumgongd av veðhaldum fyri prioritetslánum til fiskiskip, har tilsøgn um veðhald eru givin áðrenn lóg nr. 102/1988 kom í gildi í august 1988, verður í teimum førum, har víst verður á lógarheimild, víst til lóg nr. 13/1967:

§ 1 Landsstýrinum er heimilt saman við fíggjarnevndini landskassans vegna at ganga í veð fyri prioritetslánum til nýbygd fiskiskip. Hetta veðhald má tilsamans ikki fara uppum 50 mió.kr.

§ 2 Henda lóg kemur í gildi beinan vegin og verður at endurskoða í løgtingssetuni 1969.

Í einum notati dagfest 7. januar 1982, sum fyrverandi skrivstovustjóri í landsstýrinum hevur gjort viðvíkjandi innheintan av peningakrøvum landskassans í sambandi við fiskiskip, stendur viðvíkjandi veðhaldum fyri prioritetslánum í nýbygdum fiskiskipum, l.l. nr. 13/1967:

»Einki mark er í lógini sett fyri einkulta lánið og heldur ikki krav um, hvussu tað skal tryggjast. Vanliga markið í praksis er, at lánmarkið er 14% av metingarvirðinum, og at lánið, ið veðhildið verður fyri, hevur prioritet í skipinum lutanfyri 70% av virðinum. (Lógin eigur at endurnýggjast, hon hevur eitt (ókkumlerað?) mark uppá 50 miá.kr. og skulli endurskoðast í tingsetuni 1969). Lógin er serliga nýtt við skipabygging í Noregi«.

Nevnast kann, at givnar tilsøgnir í 1982/83 um veðhald fyri prioritetslánum (uttast 25% í hesum tíðarskeiði), einsamallar vóru nóg stórar til at náa markið í lógini, til dømis »fylti« bara tað eina skipið nærum 50% av markinum.

Í einum øðrum notati dagfest 9. mars 1987, sum fyrrverandi skrivstovustjórin í landsstýrinum hevur gjørt um hetta mál, í sambandi við at aðrir løgfrøðingar í landsstýrinum hevdu gjørt vart við, at ongin lógarheimild var at veita veðhald fyri prioritetslánum, standur m.a.:

»Nú kann sigast, at 1967-lógin er galdandi enn, tað mun tí vera meira enn ivasamt og sjálvt um so skulli verið, er farið upp um markið 50 miá.kr. ikki bert eina ferð, men fleiri ferðir. Hóast hesa tørvandi heimild, hava bæði landsstýrið og fíggjarnevnd játtað veðhald fyri prioritetslánum og veðhaldsumsøknir til nýbyggingar liggja fyri.

Mælt verður tí til at fáa veðhaldsheimildina endurnýggjaða.«

Tað er ilt at meta um í hvønn mun og á hvønn hátt heimildarspurningurin viðvíkjandi lóg nr. 13/1967 er viðgjørdur áðrenn 1987.

Í 1987 vóru stig tikin til nýggja lóggávu viðvíkjandi prioritetslánum til fiskiskip, og legði landsstýrið fram uppskot hesum viðvíkjandi í mars 1988 (lóg nr. 102/1988).

Vísandi til omanfyristandandi áttu stig óivað at verið tikin til at endurnýggja L.L. nr. 13/1967 longu í 1982, og ilt er at meta um, hví so nógv ár gingu áðrenn nýggj lógarheimild varð samtykt, og í hvønn mun landsstýrið síðani 1982 visti ella átti at vitað, at heimildin í L.L. nr. 13/1967 var uppbrúkt. Somuleiðis er ilt at meta um, í hvønn mun fíggjarnevndin er ella átti at verið kunnað av landsstýrinum um henda heimildarspurning, vísandi til tað, sum er ført fram av fyrrverandi skrivstovustjóra á landsskrivstovuni.

Øll veðhald fyri prioritetslánum til fiskiskip, ið eru gjøgnumgingin, eru samtykt av Fíggjarnevnd Føroya Løgtings.

7. Veðhald-/veðhaldsútlegg fyri lánum til fiskiskip:

12 av veðhaldunum/veðhaldsútleggunum viðvíkjandi fiskiskipum eru gjøgnumgingin, talan er um nokur av teim størstu, og nokur, ið eru tilvildarliga vald út.

Viðvíkjandi veðhaldum fyri lánum til fiskiskip, studulslán v.m. kann nevnast, at tá tadur um nýbygging, eru flest allar tilsøgnir uppruna(lig) givnar av landsstýrinum/fíggjarnevndini áðrenn 1987

Síðani eru fleiri av hesum veðhaldum og lánum hækkað, vísandi til at byggiprísurin bleiv hayri enn fyrst mett.

Umstøðurnar í sambandi við trý tey størstu veðhaldsútleggini eru meira nágreiniliga lýstar:

- bygginummar 53 á Skála Skipasmiðju
- bygginummar 46 á Skála Skipasmiðju
- Reynsatindur/Olaf í Gardastovu

og hartumfram er nerri greitt frá, tá veðhald v.m. vórðu veitt í sambandi við bygging av Stígarkletti og Hádegiskletti. Hini skipini verða viðgjørd undir einum.

Nevnast kann, at veðhaldsútlegg vegna bygginr. 53 og nr. 46 v.m. á Skála Skipasmiðju, eru skrásett soleiðis:

(mió.kr.)

	BRUTTO	NETTO
Bygginumnar 53	144	59
Felagsútreiðslur	22	15
Bygginumnar 46	98	71
Ialt	264	145

– **Bygginr. 53 á Skála Skipasmiðju:**

Nettoútlegg/tap landskassans viðvíkjandi bygginr. 53 kann uppsetast soleiðis:

	(mió.kr.)
Bruttoútlegg pr. ultimo 1991	144
Inngoldið frá Realinum	÷ 9
Inngoldið frá Danmarks Skibskreditfond	÷ 57
Vanligt stuðulslán	÷ 10
»Eyka« stuðulslán	÷ 9
Veðhaldsútlegg/netto	59

Við útgangsstoði í teim útreiðstum, ið beinleiðis eru bókaðar á bygginr. 53, sammett við tað, ið er útgoldið av byggiláni, kann tap landskassans nærri útgreinast soleiðis:

	(mió.kr.)
Partur av byggiláni, brúkt til annað endamál	38
Tap við sølu (munur ímillum søluprís og skrásettan kostprís)	9
Rentur, byggilán	12
Veðhaldsútlegg/netto	59

Í sambandi við bygging/fíggjan av skipinum var falt talan um hesar útleggs-, láns-, veðhalds- og stuðulsupphæddir úr landskassanum, umframt »felagsútreiðslur« uppá 15 mió.kr.:

	(mió.kr.)
Veðhaldsútlegg/netto	59
Veðhald fyri prioritetsláni	19
Stuðulslán	10
»Eyka« stuðulslán	9
Renturstudningur	14
Likviditetslán	5
Toll- & fraktendurgjald	10
	126

– **Felagsútreiðslur:**

Umfram tíma- og mánaðarlønir, sum vórðu bókaðar sum felagsútlegg, falt góðar 12 mió.kr., var talan um einar 10 mió.kr., sum harumfram vórðu nýttar til rakstur av skipasmiðjuni, keyp av tilfari í sambandi við umvælingar v.m. Bruttoútreiðslurnar til felagsútreiðslur vóru falt 22.4 mió.kr., og skrásettar inntøkur uml. 7.8 mió.kr. Nettotap landskassans skrásett sum felagsútreiðslur var sostatt uml. 14.6 mió.kr. Eftirsum so at siga onki var gjørt við bygginr. 46 má sigast, at hesar útreiðslur óbeinleiðis hava samband við at gera bygginr. 53 lidnan.

– **Bygginr. 46 á Skála Skipasmiðju:**

Tá skipasmiðjan kom í likviditetstrupulleikar fyrst í 1988, vóru einar 70 mió.kr. bókaðar sum nýttar til skipið, og svaraði hetta á leið til tað, ið útgoldið var av byggiláninum, tá tær góðar 8 mió.kr., sum fluttar vóru av byggilánum til eina, seinni tvær konti í Fossbankanum, verða tiknar við.

Árini 1988, 1989 og 1990 vóru nýttar ávikavist 1,7 mió.kr., 1,8 mió.kr. og 0,5 mió.kr., ialt einar 4 mió.kr. beinleiðis til bygginr. 46, mest útreiðslur til at hava skipið liggjandi.

Nettoútlegg/tap landskassans viðvíkjandi bygginr. 46 kann uppsetast soleiðis:

	(mió.kr.)
Bruttoútlegg pr. ultimo 1991	98
Søla, netto	+ 27
Útlegg/netto	71

Við útgangsstøði í teim útreiðslum, ið beinleiðis vóru bókaðar á bygginr. 46, sammett við tað, ið var útgoldið av byggiláni, kann tap landskassans nærri útgreinast soleiðis:

	(mió.kr.)
Partur av byggiláni bókað til annað endamál	1
Tap við sølu (munur ímillum søluprís og skrásettan kostprís)	46
Byggirentur	16
Partur av byggiláni (síðsta rata) í Fossbankanum útgoldin til búgvið	8
	71

Í sambandi við at skipasmiðjan fór í likvidatión, vóru tær 8-9 mió.kr. í Fossbankanum, sum sambært avtalu/ratuplani og ársroknskapinum vóru bundnar uppá byggilánið, fluttar á konto hjá búnum.

– **Reynsatindur/Olaf í Garðastovu:**

Í 1989 legði landskassin út 12,4 mió.kr. vegna veðhaldsskyldur mótvegis P/F í Garðastovu viðvíkjandi ávikavist vøruláni til svartkjaft, makrel, høggusfokk og sild á goymslu (10,3 mió.kr.) og útgerðarlán (2,1 mió.kr.).

Í sambandi við kanningina av hesum veðhaldsútleggum hevur roknskapargrannskoðarin gjøgnumgingið alt málið viðvíkjandi skipinum M/S Olaf í Garðastovu (P/F í Garðastovu) áður M/S Reynsatindur (P/F Atlantic Trawlers). Henda gjøgnumgongd hevur víst, at tað samlaða tapið hjá landskassanum í sambandi við umbygging og rakstur av skipinum var o.u. 131,7 mió.kr. sum hava ávirkað landsroknskapin á fylgjandi hátt:

	(mió.kr.)
Standa eftir sum veðhaldsútlegg fyri P/F í Garðastovu	79,3
Restskuld á seljarapantibrævinum (P/F í Garðastovu)	8,9
Avskrivað í 1987 (veðhaldsútlegg/stoðulslán til P/F Atlantic Trawlers)	22,5
Avskrivað í 1989 (rentuútreiðslur/kurstap landskassans v.m.	16,4
Surimi-verksmiðja	4,6
Í alt	131,7

Frá desember 1985 til medio 1987 fóru útgjaldingar fram/ávikavist øktust landskassans skyldur við tilsamans uml. 109,5 mió.kr., eins og inngjald til landskassan uppá 81,8 mió.kr. ikki vórðu bókað fyrr enn í august 1987.

– **Stígarklettur og Hádegisklettur:**

Í 1986 játtaðu landsstýrið og fíggjarnevndin 20% í veðhaldi fyri prioritetslánum í sambandi við bygging av

omanfyrinevndu trolarum á Tórshavnar Skipasmiðju við støði í einum sáttmálaprísi uppá 32 mió.kr. fyri hvønn.

Uppií prísinum vóru fyri hvønn av trolarunum íroknaðar 9 mió.kr. reiðarinum at ríða yvir til fiskireiðskap og byggirentur.

Veðhald (20%), studulslán (10%) og rentustudningur (15%) vórðu veitt við støði í einum byggikostnaði uppá 33 mió.kr. Farmagjaldsstudningur (4,5%) og tollendurgjald (16%) vórðu veitt við støði í eini virðismeting uppá ávikavist 35,1 mió.kr. og 35,9 mió.kr.

Sambært árstroknskapunum var byggikostnaðurin uml. 30 mió.kr. og heitt er á landsstýrið um at biðja um eina frágreiðing um tær ymsu virðisásetingarnar.

– **Onnur fiskiskip:**

Umfram omanfyrinevndu veðhald eru gjøgnumgangin veðhald veitt 7 øðrum skipum.
Talan er um hesi skip felløg:

P/F Rógvutangi (Brestir)
P/F Borgarknappur (Polarborg 1)
P/F Hamar (Saturn)
P/R Sjeystjørnan (Nesbúgvin)
P/F Ranin (Arctic Prawns)
P/F Fugltúgvan (Fugltúgvan)
P/F Samvinnufelagið (Høgifossur)

Roknskapargranskoðanin hevur kunnað fiskivinnuumsitingina og búskapardeildina nærri um úrslitið av grannskoðanini og viðgjørt tiltarið á fleiri fundum:

Viðmerkingar:

1. Viðvíkjandi veðhaldum fyri prioritetslánum vísir landsstýrið í flestu forum til L.L. nr. 13/67 í áritum um landskassaveðhald, og í nøkrum føru um verður ikki víst til lógarheimild. Allar tilsagnir um veðhald vórðu góðkendar av fíggjarnevndini.

2. Mett verður at tað er ivasamt um vísast kann til L.L. nr. 24/1978, tá landsstýrið í áttatiárunum í fleiri førum undirskrivaði nýggj veðhald fyri eftirstøðum og faltnari skuld viðvíkjandi lánum við landskassaveðhaldi, sum áttu at verið fult aftargoldin, og sum upprunaliga vórðu veitt í sjeytiárunum við heimild í t.d. L.L. nr. 30/1970, L.L. nr. 63/1975 og L.L. nr. 38/1976.

   Hetta fyribrigdi tykist vera ein avleiðing av, at innkrevjingin bæði í sjeyti- og áttatiárunum ikki hevur verið nøktandi, og at landsstýrið á henda hátt hevur endurtýggjað »pantivinnlið« í viðkomandi skipi í sambandi við, at nýggj lán/veðhald framhaldandi vórðu veitt m.a. í sambandi við nógvar umbyggingar.

3. Viðvíkjandi eftirkannan av um eginpeningskrøvini í L.L. nr. 24/1978 vóru uppfylt í sambandi við játtan av teim nógvu studulslánum til umbyggingar, upplýsir umsitingin generelt, at orka ikki hevur verið í umsitingini til at kanna, um hesar treytir vórðu uppfyltar.

4. Tann fyri landsstýrinum upplýsti byggikostnaður, sum er nýttur sum støði undir veittum veðhaldum, studulslánum og rentustudningi, er í fleiri førum munandi hægri enn bókaða virðið á skipunum sambært árstroknskapunum, eins og eginpeningur/partapeningur sambært árstroknskapi/partafelagsskráasetingini ikki er á sama støði, sum upplýst fyri landsstýrinum.

   Umsitingin metir, at tað er ivasamt um krøvini um eginpening vóru uppfylt, vísandi til omanfyristandandi hesum viðvíkjandi. Váttanir um eginpening, sáttmálaprísir og virðismetingar vóru tiknar fyri »góðar vørur«, men umsitingin metir, at tað ongantíð hevði verið rutina í landsstýrinum at biðja um árstrokn-

skap fyri fyrsta árið, til tess at eftirkontrollera upplýsingar um t.d. skipavirðið og eginpening/partapening. Ein av orsøkunum til tess, var ov lítil manning og manglandi fastar rutinur viðvíkjandi saksviðgerð.

Ført verður eisini fram, at Fiskivinnuumsitingin ikki varð stovnað fyrr enn í 1986 og ikki veruliga tók yvir ábyrgdina av skipabyggimálum fyrr enn í seinnu helvt av 1987 og harumframt var bundin av givnum tilsøgnum áðrenn hetta tíðarskeið.

5. Spurd um, hvør grundgevingin er fyri, at t.d. ein treyt fyri innflutningsloyvi til ein bát uppá 167 BRT er, at ein útróðrarbátur uppá 11,85 BRT fer úr føroyska veiðuflotanum, og hvørjar reglur hava verið galdandi hesum viðvíkjandi upplýsir umsitingin generelt, at reglurnar ikki hava verið heilt greiðar, og at talan ofta hevur verið um upp til fleiri og fleiri »umvekslingar« við minni og minni skip.

6. Fleiri dømi eru um at landsstýrið í eitt langt áramál legði út pening sum veðhaldsútlegg fyri ávís skip, og samstundis fleiri ferðir gav boð um at steðga innkrevjing, sum gjaldstovan eftir áheitan frá landsstýrinum hevði tikið stig til. Umsitingin metir, at gongdin viðvíkjandi innkrevjing í hesum málum hevði verið við til at blokera alla innkrevjing og var ein av høvuðsforðingunum fyri, at farast kundi eftir øðrum, og hevur reist spurningin um, at tá veðhaldsútlegg ikki verða kravd innaftur og renturoknað í eitt so langt tíðarskeið, so er talan ikki longur um eitt veðhald, men heldur um eina óheimilaða rakstrarjáttan til ávís skip.

7. Umsitingin førir fram, at ein kann velja at síggja tey viðurskifti, sum umrødd verða í grannskoðanarfrágreiðingini, sum einstøk mál, har málsviðgerðin hevur verið ov vánalig. Men mett verður, at í veruleikanum hava høvuðstrupulleikarnir verið feilir í umsitingarbygnaðinum, sum undir einum kunnu kallast »systemfeilir«:

- a) Umsitingin hevur ikki verið nóg sterk og væl kvalifiserað á tungum uppgávum, t.d. viðvíkjandi veðhaldum og skipabyggimálum, og politisku myndugleikarnir hava sostatt í nógvum førum ikki havt eitt fakligt mótspæl.
- b) Generelt hevði verið ov lítil manning í umsitingini.
- c) Manglandi lógarkrøv/reglur um fakliga viðgerð og faklig tilmæli.
- d) Manglandi krøv um skrivligar frágreiðingar í øllum málum, harundir ein meting bæði sum einkultmál og sum liður í einari samlaðari/størri samfelagsligari heild.
- e) Tað hevur ikki verið førdur ein starvsfólkapolitikkur, ið kundi útvegað landsstýrinum ta arbeiðsmegi, ið landsstýrinum tørvaði, og hildið fast uppá hesa arbeiðsmegi. Hetta hevur ført við sær skeiva manning, stóra útskifting og lítlan kontinuitet í arbeiðinum, og tað hava verið manglandi krøv um eftirútbúgving av teimum medarbeiðarum, ið ikki frá byrjan høvdu neyðugu útbúgvingarnar.

8. Veðhald fyri lánum til flakavirkir:

Í grannskoðanarfrágreiðingini eru veðhald til trý flakavirkir umrødd. Talan er um nøkur veðhald veitt í sambandi við munandi útbygging av P/F Norðís, P/F Sólarris og P/F Kósavirkinum, sum íalt kostaðu landskassanum útvið 60 mió.kr., íroknað mistan partapening.

Veðhald fyri lánum til útbygging/framleiðsluøking á hesum og mongum øðrum flakavirkjum tykjast ikki vera veitt við støði í eini heildarmeting av tørvi á framleiðsluorku í mun til rávørunøgd. Felags fyri lán við landskassaveðhaldi var, at hesi ikki vórðu afturgoldin. Veðhaldsútlegg vóru ikki heintaði ina men seinni niðurfryst ella avskrivað, eins og eftirstøður og fallin skuld av gomlum lánum við landskassaveðhaldi vórðu umskipað til nýggj lán við landskassaveðhaldi.

9. Veðhald fyri lánum til onnur virkir:

Í grannskoðanarfrágreiðingini eru umrødd veðhald veitt P/F Blue North, P/F Klaksvíkar Roykivirki og P/F Atlantic Fish Cold Storage.

Løgtingið samtykti í 1984 eina serstaka lóg, Ll.nr. 38/1984, um veðhald fyri láni til **P/F Blue North** uppá

í mesta lagi 2,8 mió.kr. og at seta 460 t.kr. í felagið, og løgtingið varð kunnað um ætlaðu almennu studningsupphæddirnar uppá 2,1 mió.kr. Lógaruppskotið varð lagt fyri tingið áðrenn Búskaparráðið hevði havt høvi at viðgera málið. Tá avtornaði hevði Blue North-prosjektið kostað tí almenna, íroknað lán og stuðul úr Menningargrunninum, grunninum til ídnaðarfremjandi endamál, Menningarstovuni, serliga grunni III í Lønjavningargrunninum og konto »Landsstýrinum at ráða yvir« einar 45-50 mió.kr.

Við gjøgnumgongd av málinum sæst, at tað ikki verður víst til løgtingslóg nr. 38/1984 í sambandi við at veðhald seinni vórðu givin. Víst verður í staðin til Ll. nr. 18/1960 og til Ll. nr. 35/1988. Orsøkin er helst hon, at heimildin í Ll. nr. 38/1984 vísti seg at vera alt ov lítil.

Umsitingin er biðin um geva eina frágreiðing um eitt goymsluveðhald uppá 5 mió.kr., ið veitt varð í 1987. Mett verður, at eitt veðhald fyri láni uppá 5,2 mió.kr., sum varð veitt í oktober 1988, vísandi til heimild í Ll. nr. 35/1988, ikki leyk treytirnar í lógini.

Í tíðarskeiðinum 1989 til 1992 legði landskassin út 17 mió.kr. vegna veðhald veitt í 1988 fyri tveimum lánum til **P/F Atlantic Fish Cold Storage**. Um Grunnurin til Ídnaðarfremjandi Endamál og Menningargrunnurin verða íroknaðir, misti landskassin falt einar 25 mió.kr. í sambandi við, at virkið varð selt á tvingsilssølu.

Hóast umsitingin í sínum ummæli setti spurnartekin við grundleggjandi fyritreytir í einum uppleggi um byggingina av goymsluni, og Búskaparráðið í sínum ummæli greitt mælti frá, samtykti landsstýrið í 1986 í »prinsippinum« at veðhalda fyri lánum til hetta prosjekt.

Nevndin í Menningargrunninum samtykti í 1986 at veita lán uppá 2 mió.kr. til hetta prosjekt við landsstýrisins góðkenning, hóast Menningargrunnurin í drúgvari frágreiðing gjølla hevði greitt frá, at rentabilitetur ikki kom at vera í prosjektinum. Ein treyt fyri láninum var, at partapeningurin varð 15% av kostnaðinum. Boðað varð frá, at lánið ikki undir nøkrum umstøðum fór at verða hækkað. Lánið varð tó í 1988 og 1989 hækkað við ávikavist 2 og 0,5 mió.kr.

Vísandi til bókaða virðið av bygninginum í ársroknskapinum uppá 30 mió.kr. metti umsitingin í einum til mæli í 1990, at pláss var ikki fyri nøkrum landskassaveðhaldi, og at treytir settar av landsstýrinum og Menningargrunninum um eginpening/partapening ikki vórðu hildnar.

10. Veðhald fyri lánum til kommunur:

Manglandi samskifti millum landsverkfroðingin og landsstýrið hava fort við sær, at ofta stórar havnaútbyggingar vórðu settar í verk, uttan at landsstýrið hevði havt hovi til at taka støðu til og geva neyðug loyvi eftir grein 39 í kommunulógini 2. stk., har ásett er, at um eitt arbeiði skal verða fíggjað við lántøku, má ikki verða byrjað, fyrr enn loyvi landsstýrisins fyriliggur. Tá umsóknir frá kommununum um lán/veðhald komu til landsstýrið, var hetta í so máta »ov seint«, við tað kommunurnar tá vóru sáttmálabundnar, og landsstýrið hevði tá onki annað val enn at játta. Tann einasta góðkenning, ið vanliga fyriliggur, er tann »tekniska« góðkenningin frá landsverkfrøðinginum, sambært Ll. nr. 61 frá 9. juni 1988 um 8-ára ætlan fyri útbygging av havnunum.

11. Veðhald fyri lání til P/F Atlantic Airways:

Tað størsta veðhaldið, ið veitt er í tíðarskeiðinum 1989-1991, er uppá 70 mió.kr. til P/F Atlantic Airways í 1989.

Veðhald varð givið sambært løgtingslóg nr. 29 frá 20. apríl 1989. Orsøkin til at hetta veðhald varð givið tá var, at Maersk Air fekk dømt Cimber Air til at fara burturúr samvinnuni við føroyingar í P/F Atlantic Airways.

Í tí sambandinum yvirtók P/F Flogleiðir partapeningin hjá Cimber Air uppá 980 t.kr., svarandi til 49%, eins og landskassin yvirtók veðhaldsskyldana sum Cimber Air hevði fyri lántøku hjá P/F Atlantic Airways. Hereftir átti P/F Flogleiðir sostatt einsamalt allan partapeningin í P/F Atlantic Airways.

Sambært omanfyri nevndu lóg fekk landsstýrið heimild at hækka tann beinleiðis partapeningin í p/f Flogleiðir við 9.750 t.kr.

Við gjøgnumgongd av hesum løgtingsmáli sæst, at fíggjarnevndin í mars mánaði 1989 m.a. hevur gjøgnumgingið fíggjar- og rakstrarættan fyri 1989 hjá p/f Atlantic Airways.

Sambært álitinum hevur fíggjarnevndin:

»fingið ta fatan, at vónir eru fyri, at raksturin av føroyska flogfelagnum framyvir kemur at bera seg – alt annað líka – um skynsamliga verður atborið. Fíggjarnevndin vil sostatt mæla løgtinginum til at veita landsstýrinum umbidnu heimildina at veðhalda, hóast upphæddin er stór.«

Í løgmansrøðuni í 1992 varð sagt: *»Føroyska flogfelagnum hevur enn ikki nýtst fíggjarligt ískoyti - og fær tað valla.«*

25. november 1992 legði landsstýrið uppskot fyri løgtingið um nýteknan av partapeningi í felagið uppá 75 mió.kr. Sambært viðmerkingum landsstýrisins til lógaruppskotið verður mett, at sum fíggjarstøðan er hjá felagnum, er givið, at veðhaldið verður effektivt, og verður partapeningurin partvís (70 mió.kr.) nýttur til at niðurgjalda skuldina við, samstundis sum veðhaldið fellur burtur, og partvís nýttur til ískoytisgjaldføri hjá felagnum.

12. Veðhald fyri lánum til IRF:

Sambært lóg nr. 29 frá 5. mei 1981 varð landsstýrið heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri láni til Interkommunala Renovatiónsfelagsskapin til bygging av brennistøð.

Sambært viðmerkingunum til lógaruppskotið var ætlanin at byggja eina brennistøð, ið kundi brenna ruskið frá øllum landinum (3 tons ovn), og varð støðin mett at kosta 29,8 mió.kr. (í 1980- prísum).

Um heystið 1981 varð upptikið eitt lán uppá NLG 11,4 mió., tá svarandi til uml. 32,3 mió.kr., til 13 1/8% p.a., ið skuldi afturgjaldast við NLG 1.140.000 bvønn 5. oktober frá 1987 -1996.

Ymiskir trupulleikar vóru við at fáa byggiloyvi til brennistøðina, og ikki fyrr enn í 1987 kom gongd á byggingina av brennistøðini í Leirvík, sum varð tikin í nýtslu í 1989.

Hóast munandi broyttar umstøður og fyritreytir veitti landsstýrið í 1988 við heimild í omanfyrinevndu lóg nr. 29 frá 5. mei 1981 veðhald fyri einum nýggjum DEM-láni til IRF uppá 40 mió.kr., og í 1989 veðhelt landsstýrið fyri, at DEM-lánið varð hækkað við 20 mió.kr. til í alt 60 mió.kr., sum allar fullu til gjaldingar í 1993.

Burtursæð frá 0,3 mió.kr. í 1981, hava kommunurnar ikki goldið limagjald í tíðarskeiðinum fram til 1989, tá brennistøðin varð tikin í nýtslu.

Árini 1989-1991 rindaðu kommunurnar bert acontogjøld. Hóast stór rakstrarhall varð endaliga limagjaldið tó ongantíð ásett og innkravt sambært § 5 í lógum felagsins.

Samlaðu veðhaldsútlegg landskassans fram til og við 1991 vóru einar 36,5 mió.kr. Av hesum var ongi kravt innaftur frá limakommununum.

Tann 14. apríl 1993 samtykti løgtingið uppskot landsstýrisins um at strika 33 mió.kr. skuld hjá IRF, ið stavar frá útleggum fyri lánum hjá felagsskapinum. Sambært § 1, 2. stk., er strikingin treytað av, at felagsskapurin ger neyðug tiltøk, sum frameftir gera javnvág í rakstrinum.

Í sambandi við avtaluna, ið gjørd varð við donsku stjórnina í mei mánaði 1993 um umskipan av utanlandaskuldini til statslán, varð skuld hjá IRF uppá 60 mió.kr. innfríað av landskassanum. Upphæddin verður nú renturoknað og ein afturgjaldsskipan er gjørd.

13. Innkrevjing:

Í grannskoðanarfrágreiðingini verður vist á, at landskassin seinnu árini hevur mist tíggjutals milliónir í sambandi við at vøruinnflytarar hava fingið undantaksloyvi til tollkreditt. Landskassin kemur í so at siga øllum føroum at missa pening, um ein vøruinnflytari kemur í fíggjarligar trupulleikar, av tí at kreditttíðin er 2-3 mánaðir, meðan trygdin er ásett við stoði í innflutningsgjaldinum í 1 meðal mánaði, men metti verður, at høvuðsorsøkin til, at tað hava verið so stór tap viðvíkjandi tollkreditti er, at umsitingin av hesum undantaksloyvum ikki hevur verið í tráð við kunngerðina frá landsstýrinum. Hóast vøruinnflytarar ikki hava goldið og ikki latið skjøt inn til tollingar til ásetta tíð, er alt ov long tíð gingin til vøruinnflytarin hevur mist undantaksloyvið. Reglurnar um sraffrentu eru ikki fylgdar, og rentur eru strikaðar/eftirgivnar hóast ongin lagin ild hevur verið til tess. Í fleiri føroum hevur trygdin verið undir tað, ið ásett er í kunngerðini.

Nevnast skal, at umanfyrinevndu viðurskifti viðvíkjandi umsiting av tollkreditti sum heild eru komin í rætt lag í 1993.

Umfram tollkreditt hava trupulleikar eisini verið við innkrevjing av øðrum gjøldum. Viðvíkjandi brennioljugjaldi hevur landskassin eftir øllum at dømna mist uml. 6 mió.kr., tí P/F Oljufelagið Føroyar ikki hevur avroknað hesi gjøld. Felagið er farið konkurs, men virksemið heldur fram í øðrum navni/felag. Ongar beinleiðis ásetingar hava verið í lógini um kreditt fyrr enn frá 1. januar 1993, men onki er ásett um trygd.

- - - - -

Viðvíkjandi avrokning/innkrevjing av **ferðagjaldi** verður landsstýrið, upprunaliga í Ll. nr. 23/1987, at áseta nærri reglur fyri innigjalding av gjaldinum.

Hesar reglur vórðu ikki ásettar fyrr enn í 1994. Upplýst er frá Toll- og Skattstovu Føroya, at mannagongdin áður vanliga hevur verið, at ferðagjøld eru avroknað sum tollkredittur. Henda tíðarfreist varð í fleiri føroum ikki hildin, og vísandi til at onki varð ásett í lógini/kunngerð um rentur ella kredittíð, reisti gjaldstovan spurningin, um heimild er at geva kreditt/gera serligar gjaldsavtalur við ávís feløg.

- - - - -

Tað tykist ikki sum tann orka og tey amboð, ið nýtt vórðu til innkrevjing av umanfyrinevndu gjøldum (primert pantring) hava verið nóg munagóð.

- - - - -

Nevnast kann eisini, at innkrevjingarlóggávan ikki er samskipað og dagførd.

- - - - -

Viðvíkjandi partafelagsskatti er talan um eini 1000 partafelog. Nógv av hesum hava hvørki latið roknskap ella sjálvuppgávu inn í áravís, og ein stórur partur av eftirstøðunum eru »metingar«.

Viðvíkjandi **veðhaldum/veðhaldsúttleggum, serlánum, studulslánum og kredittum til vinnulívið annars**, er tað landsstýrið, sum primert hevur/hevur havt ábyrgdina av at fylgja við gongdini og at geva gjaldstovuni boð um skráseting, bókingar, hvørji stig skulu takast viðvíkjandi innkrevjing, avskriving v.m.

Búskapardeildin metir í hesum sambandi, at tað er týdningarmikið at striku undir, at talan bert er um ein innkrevjingarfulltrúa, sum í tíðarskeiðinum 1991-1993 hevði havt úr at geta við at fáa skil á teimum mongu effektivu veðhaldunum uppá uml. 0,5 mia.kr.

Landsstýrið hevur í nógvum føroum ikki givið boð um eina »effektiva« innkrevjing, og í fleiri føroum givið boð um at steðga innheintingum, tvingsilssølum, sum stig annars vóru tikin til

Í nógvum førum hava peningastovnarnir miðvíst stýrt gjaldførinum hjá virkjum/skipum á ein hátt, so at almenn gjøld, ella afturgjalding av landskassalánum ella høgt rentaðum lánum við landskassaveðhaldi, koma í síðstu røð, og skip og virkir hava kunna hildið áfram í áravís, hóast veðhaldsútlegg og vaksandi eftirstøður av almennum lánum. Samstundis sum nýggj veðhald og almenn lán eru veitt, eru gomul veðhald og misrøkt lán í fleiri førum »umløgd« ella »umskipað«.

Vísast kann á tilmæli frá innkrevjingarfulltrúanum í 1992 um at lýsa eitt felag konkurs. Í hesum sambandi varð m.a. umrøtt, um § 74 í konkurslógini kundi nýtast til at »umstoyta« afturgjaldingar av lánum, m.a. til ein ávísan banka vegna »tilvitaða forfordeiling«.

Løgfrøðiliga varð tá mett, at lítil kjansur var fyri at fáa viðhald í rættinum, m.a. vísandi til at landsstýrið hevði verið fult vitandi um hesi viðurskifti og havt avtalur við bankarnar um at loyva, at eftirstøðurnar á lánum við landskassaveðhaldi kundu vaksa uttan at krevja, at veðhaldini skuldu gerast effektiv.

Mett verður ikki at landsstýrið hevur havt heimild at umsita veðhald og veita lán á ein tílíkan hátt uttan aðra lógarheimild ella játtan.

- - - - -

Nógv hava havt eina fatan av, at afturgjalding av ávísari almennari skuld/eftirstøðum kundi koma í síðstu røð, uttan at hetta fekk stórvegis avleiðingar, og skip og virkir hava m.a. av hesi orsøk kunnað hildið áfram, hóast tey hava verið »konkursbúgvin« í fleiri ár.

Hetta hevur verið kappingaravlagandi, og tey vinnuvirki/skip, ið hava roynt at hildið sínar skyldur ella ikki havt landskassalán ella lán við landskassaveðhaldi, hava verið fyri vanbýti.

- - - - -

Trupulleikarnir viðvíkjandi teim vaksandi eftirstøðunum hava ikki verið nóg »sjónligir«, m.a. tí broytingar í eftirstøðunum ikki beinleiðis eru tiknar við á fíggjarlógini, sum tí ikki gevur eina greiða tuynd av veruligu inntøkunum og harvið gjaldføristørvinum, og innkrevjingaramboðini og leikluturin hjá Føroya Gjaldstovu í hesum sambandi er tí ikki tikin til viðgerðar fyrr enn tað er ov seint. Í sambandi við uppsetan av fíggjarlógini fyri 1995 varð avgjørt at taka broytingar í eftirstøðum við.

14: Búskaparráðið:

Sambært løgtingslóg nr. 42/1963 verður landsstýrið at skipa eitt Búskaparráð við trimum limum við tí endamáli:

- at kanna fíggjarligu støðu hins almenna og fíggjarligu viðurskifti landsins.
- at fáa bygt upp tíðarsvarandi og rationellan framleiðsluútbúna.
- at leggja haldgott grundarlag undir hinar einstøku vinnulívsgreinarnar og búskap landsins sum heild.
- at tryggja og økja inntøkumøguleikar vinnustættana.

Sambært lógini fær ráðið heimild til at taka sær skrivara, sakkøna og aðra hjálp og at krevja sær frágreiðingar og aðrar upplýsingar frá stovnum og feløgum. Ásett er eisum í lógini, at tann sum við vilja gevur raugar frágreiðingar ella noktar fyri at geva frágreiðingar, kemur undir sekt, um hann ikki kemur undir hægri revsing.

Sambært viðmerkingum landsstýrisins til uppskotið var skipan av ráðnum ein liður í at fáa bygt upp tíðarsvarandi og rationellan framleiðsluútbúna. Endamálið við ráðnum var sostatt m.a. at hjálpa til at veita trygt støði undir uppskotum um fíggjarliga og vinnuliga útbygging.

Í reglugerð fyri Búskaparráðið sum lýst í kunngerð nr. 47/1969 varð m.a. ásett, at ráðið skal ganga landsstýrinum til handa at kanna búskaparligar spurningar á teim ymsu vinnulívsøkjunum, viðgera og geva ummæli í serstøkum málum, sum verða løgd fyri tað, og seta fram uppskot um tiltøk, sum ætlast at vera vinnulívinum at gagni.

Búskaparráðið hevur fingið nøkur av omanfyri umrøddu málum til ummælis, men tað tykist ikki hava verið nøkur skipað mannagongd hesum viðvíkjandi. Í nøkrum førum tók landsstýrið avgerð um lán/veðhald áðrenn Búskaparráðið hevði havt høvi at taka støðu til eitt mál. Í flestu førum mælti Búskaparráðið frá, men landsstýrið fylgdi í nógvum førum ikki hesum tilmælum, uttan at tað greitt sæst, hvørjar aðrar fyritreytir landsstýrið hevur lagt dent á í sínum avgerðum.

Lógin um búskaparráð varð avtikin sambært § 8, 2. stk., í Ll. nr. 33 frá 7. mei 1991 um Hagstovu Føroya.

1. juni 1995 samtykti løgtingið eina nýggja lóg um Búskaparráð

15: Ymsir grunnar:

– Orkugrunnurin

Reglur um orkugrunn og orkuráð eru ásettar í løgtingslóg nr. 48/1979 um Orkuráð og Orkugrunn.

Sambært § 1 í lógini verður landsstýrinum heimilað at skipa 5-manna ráð, hvørs uppgáva er at vera ráðgevi hjá politisku myndugleikunum í øllum orkuspurningum, harundir av egnum ávum gera tiltøk, sum vera mett deils at veita hollari kunnleika á orkuøkinum, og deils at geva myndugleikunum betri grundarlag at taka avgerðir á.

Í § 2 er ásett, at um landsstýrið og Orkuráðið eru samd um, at ávísar metingar, kanningar ella royndir eiga at verða framdar, verða útreiðslurnar, ið standast av hesum tiltøkum, goldnar úr Orkugrunninum. Í henda grunn verður, sum tørvur er á, játtaður peningur á fíggjarløgtingslógunum.

Orkugrunnurin varð avtikin í 1991, og varð hetta staðfest við løgtingslóg nr. 33 frá 27. mars 1992 um avtøku av landskassagrunnum.

Umframt útreiðslur til Orkuráðið uppá 7,3 mió.kr. eru úr grunninum síðani 1980/81 eisini nýttar einar 11,3 mió.kr. til ymiskar kanningar og royndir viðvíkjandi vindorku, vatnmegiútbygging, kanning av avlopshita, bjálving av húsum o.t.

Lánsveiting

15. desember **1987** samtykti landsstýrið at veita eitt lán úr Orkugrunninum uppá **2,5 mió.kr.** til **P/F Oljufelagið Føroyar** til partvísa fígging av oljutangum. Við mótrokning og tvingsilssølu er lánið afturgoldið.

18. februar **1988** samtykti landsstýrið at veita fjarhitaskipanini **20 mió.kr.** í láni úr Orkugrunninum eftir stuðulslánstreytum. Lánið varð útgoldið til **L/F Hitafelagið** í 1989 við panti í fløgunum. Hesin peningur er síðani mistur, í sambandi við at ognir felagsins eru seldar á tvingsilssølu og felagið er farið konkurs.

7. apríl **1989** samtykti landsstýrið at veita eitt lán uppá **2,5 mió.kr.** úr Orkugrunninum til **IRF** til fløgur í ROY/IRF, sum tekur sær av olju- og oljulíknandi burturkasti, har ein partur av spilloljuni kann endurnýtast sum brenniolja.

- Oljugrunnurin

Við løgtingslóg nr. 99 frá 1. oktober 1986 um serligt gjald á brenniolju v.m. varð gjald lagt á innflutningin av olju v.m.

Sambært § 3, 1. stk., í lógini varð ásett, at tær inntøkur, sum landskassin fær av gjaldi sambært hesi lóg, fara í serstakan grunn (Oljugrunnin).

Sambært § 3, 2. stk., hevði grunnurin til endamáls at veita almennum stovnum og grunnum lán fyri at mótvirka lántøku uttanlands.

Oljugrunnurin varð avtikin í 1991, og varð hetta staðfest við løgtingslóg nr. 33 frá 27. mars 1992 um avtøku av landskassagrunnum.

Brennioljugjaldið í tíðarskeiðinum 1986 til 1990 var 367 mió.kr., og harumfram hevur grunnurin hesi árini havt renteinntøkur uppá umr. 35 mió.kr.

Oljugjaldið hevur í tíðarskeiðinum 1986 til 1990 ikki ávirkað yvirskot/hall á fíggjarlógini, men er lagt í oljugrunnin.

Av innkravda oljugjaldinum í tíðarskeiðinum 1986 til 1990 kom umleið helmingurin ongantið í grunnin, men varð nýttur til at fíggja rakstur/hall landskassans hesi árini.

Lánini til Menningargrunnin, Húsalánsgrunnin og Føroya Ídnaðargrunn í alt 110 mió.kr. eru síðani eftirgivin við lóg í sambandi við fíggjarligar trupulleikar í hesum grunnum, og tær 35 mió.kr., ið lentar vóru til L/F Hitafelagið í 1990, eru mistar í sambandi við, at ognir felagsins eru seldar á tvingsilssølu og felagið farið konkurs.

Lánið uppá 35 mió.kr. til L/F Hitafelagið í 1990 varð veitt í sambandi við, at felagið tá var í fíggjarligum trupulleikum vegna broyttar fortreytir og m.a. ikki hevði fingið figging úr Íleggingargrunninum fyri Føroyar, sum ikki metti seg hava nóg góða trygd, vísandi til § 4 í viðtøkunum fyri L/F Hitafelagið, har ábyrgdin hjá lutaeigarunum SEV og Tórshavnar Kommunu var avmarkað til 0,5 mió.kr. fyri hvørn.

Í einum tilmæli frá umsitingini dagfest 27. februar 1990 verður vístá, at tá landsstýrið í sínari tíð veitti eitt lán uppá 20 mió.kr. úr Orkugrunninum, varð dentur lagdur á, at landsstýrið við hesum hevði gjørt sín part og hjálpt til við tí likviditetstilskoti, sum var neyðugt í uppbyggingarfasuni, samhert útrokningum hjá Orkuráðnum, og at tað neyvan hevði verið so stór undirtøka tá, um tað tá var komið fram, at likviditetstilskotið heldur skuldi vera 55 mió.kr. og eisini umfata veðhald fyri lánum hjá Hitafelagnum.

Í tilmælinum verður m.a. vístá, at við Hitafelagnum er tann høvuðsóvissa, at ongin reiðtiliga hevur ábyrgdina. Tórshavnar kommuna hevur sett 500 t.kr. í felagið, men vil annars onga ábyrgd hava, og SEV hevur sett 500 t.kr. og sigur tað heldur ikki vera nakað hjartamál hjá sær. Upplýst verður, at stýrið fyri Íleggingargrunnin vísti til hesa væntandi ábyrgd, tá tað avvísti at lena út pening til Hitafelagið. Men verður, at eitt minstakrav má vera, at Hitafelagið so ella so við kommunu ella brúkarum hevur eina fíggjarliga ábyrgd og ikki bert kann draga lán úr landskassanum ella veðhald.

Mælt varð tí til, at lántið uppá 35 mió.kr. úr Oljugrunninum ikki verður útgoldið, áðrenn hesi viðurskifti eru fingið í rettlag og fult yvirlit fest yvir, hvussu nógv ætlanin er at ábyrgja landskassan.

– Gistingarhúsgrunnurin

Í sambandi við grannskoðanina av ársrokniskapinum fyri 1990 varð gjørt vart við, at í saunlaða útláni grunnsins uppá 9,2 mió.kr. vóru fleiri debitorar, sum í áravís ikki høvdu goldið rentur og avdráttir, eins og nakrar av ognunum, ið grunnurin hevði veð í, vóru seldar á tvingsilssølu.

Mett var, at fyriskipaða mannagongdin viðvíkjandi lánsjátanum í flestu førum ikki hevði verið nóg trygg, og í ávísum føri beinleiðis í stríð við reglugerðina, og at tað harumfram eisini kundi hugsast, at virksemi grunnsins í ein ávísan mun hevur verið til skaða fyri og fordað fyri eina menning av tí partinum av hotelvinnuni, ið hevði noyt at bildið sínar skyldur og bygt á eitt meira umhugsað grundarlag.

– Grunnar viðvíkjandi samferðslumálum

Í grannskoðanarfrágreiðingini er nýtslan í teinum 4 stórstu grunnunum á samferðsluøkinum nærri útgreinað. Í grunnunum er henda nýtsla skrásett:

(mió.kr.)

	1991	1990	1989	1988	1987	1986	Ialt
Havnagerð	102,9	85,8	87,7	66,2	50,4	43,8	436,8
Lendingar	24,7	22,4	20,4	22,8	20,9	21,6	132,8
Flogferðsla	1,1	7,3	24,5	36,7	4,1	2,5	76,2
Bergbot- og brúgvagerð	30,0	38,3	61,1	117,1	81,9	43,6	372,0
Ialt	158,7	153,8	193,7	242,8	157,3	111,5	1.017,8

– **Veðhaldsgrunnurin**

Grunnurin móti tapum av veðhaldum varð avtikin í 1991. Sambært landskassaroknskapunum 1988-1990 vórðu niðanfyristandandi upphæddir skrásettar við ársenda í hesum grunni.

(mió.kr.)

AKTIV (akkumulerað veðhaldsútlegg, netto)	1988	1989	1990
Skála Skipasmiðja	49,8	127,4	147,1
Vágs Skipasmiðja	5,4	25,1	44,4
Veðhaldsútlegg	464,9	634,5	707,0
Saldo ultimo ialt	520,1	787,0	898,5
PASSIV (játtan ÷ avskrivað veðhaldsútlegg)			
Saldo primo	251,1	503,3	586,9
Játtan á fíggjarlógini, § 21	50,0	105,0	80,0
Landskassaavlop 1987	231,4	-	-
Rentur	0,3	0,3	0,2
Avskrivað veðhaldsútlegg	÷ 29,5	÷ 21,7	÷ 58,3
	252,2	83,6	21,9
Saldo ultimo ialt	503,3	586,9	608,8
Munur ímillum aktiv og passiv (meirnýtsla)	16,8	200,1	289,7

Munur ímillum aktiv og passiv vísir, hvussu nógv er skrásett sum veðhaldsútlegg við ársenda í mun til tað, sum í alt er játtað í grunnin. Tá grunnurin varð avtikin í 1990, var akkumuleraða »meirnýtslan« 289,7 mió.kr.

Í sambandi við, at grunnurin varð avtikin, vórðu akkumuleraðu nettoveðhaldsútleggini uppá 898,5 mió.kr. ultimo 1990 avskrivað roknskaparliga.

Í grannskoðanarfrágreiðingini skjal 3 er eitt yvirlit yvir tey størstu veðhaldsútleggini.

6. *Løgtingsgrannskoðararnir/viðmerkingar:*

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið grannskoðanarfrágreiðingina frá Grannskoðanardeild Landskassans og løgtingsins statsautoriseraða grannskoðara og hava harumframt kunnað seg nærri um ávís øki við at gjøgnumganga arbeiðsskjøl, fundarfrágreiðingar, viðmerkingar og samskiftið við landsstýrið/umsitingina.

Viðvíkjandi teim viðurskiftum, sum umrødd eru av roknskapargrannskoðanini, hava løgtingsgrannskoðararnir hesar viðmerkingar:

Meirnýtsla

Løgtingsgrannskoðararnir átala enn einaferð ta meirnýtslu, ið verið hevur, og at landsstýrið ikki fyrr enn í 1991 legði eina eykafíggjarlóg fyri tingið.

Viðvíkjandi leiklutinum hjá fíggjarnevndini í sambandi við tær nógvu eykajáttanir, ið givnar eru, mæla løg

tingsgrannskoðararnir til, at reglur verða ásettar fyri virksemínum hjá fíggjarnevndini, harundir nær og undir hvørjum umstøðum umbøn um eykajáttan skal leggjast fyri tingið, og nær ein umbøn um eykajáttan kann leggjast fyri fíggjarnevndina, greiðar reglur fyri hvørji krav ein umbøn um eykajáttan frá fíggjarnevndini skal lúka, innlit í tey mál viðvíkjandi eykajáttan, ið viðgjørd verða í fíggjarnevndini o.s.fr.

Upphøggingarstuðul

Átalað verður, at upphøggingarstuðulin, sum varð veittur eftir reglugerð nr. 27/1988, ikki í øllum førum varð veittur í tráð við reglugerðina. Mett verður, at stuðulin serliga hevur verið til fyrimuns fyri og hevur hjálpt persónum, feløgum og peningastovnum burtur úr fíggjarligum trupulleikum.

Serlán

Átalað verður, at treytirnar fyri lánsveitingum sambæt lóg/kunngerð í fleiri førum ikki vórðu hildnar.

Almannamál

Løgtingsgrannskoðararnir átala umsitingina av partum av almannaøkinum og meta, at bæði føroyskir og dartskir myndugleikar hava undirmett ta stóru uppgávu, ið yvirtøkan av umsitingini av einum so stórum málsøki bar í sær.

Lóg nr. 13/1967 um veðhald fyri prioritetslánum

Løgtingsgrannskoðararnir átala, at stig ikki longu fyrst í áttatiárunum vórðu tikin til at endurnýggja lóg nr. 13/1967.

Viðvíkjandi ábyrgdar-/heimildarspurninglunum hjá landsstýrinum er avgerandi at vísa á, at Fíggjarnevnd Føroya Løgtings hevur samtykt øll veðhald fyri prioritetslánum til fiskiskip.

Um sammett verður við støðuna hjá einum danskum ráðharra, verður rætturliga vanlipa mett, at hesin uttan ábyrgd kann halda eina úreiðslu, um so er, at henda er samtykt av fíggjarnevndini (burtursæð frá heilt serligum førum, m.a. tá skeivar ella villleiðandi upplýsingar eru latnar nevndini, ella tá ráðharrin átti at vitað, at tingið ikki vildi góðkent avgerð fíggjarnevndarinnar).

Veðhald-/veðhaldsútlegg fyri lánum til fiskiskip

Eins og fyrr varð fram í álitinum frá løgtingsgrannskoðarunum dagfest 16. februar 1994 viðvíkjandi rokuskapunum hjá Lánjavningar- og Ráfiskagrunninum má ásannast, at milliardstuðulin úr hesum grunnum, tey nógvu veðhaldini og stuðulslán v.m. í sambandi við bygging og umbygging av skipum, ikki hava verið samfelagnum til gagns í tann mun, ætlanin var.

Ein av orsøkunum er óivað, at tær politisku avgerðirnar ikki hava bygt á eitt nóg gott fakligt grundarlag, hvørki tá talan var um einkultmál ella út frá eini vinnuligari og samfelagsligari heildarmeting.

Rakstraætlanirnar hava ikki verið nóg realistiskar og eftirfarandi, og fleiri av ilagunum átti neyvan at verið gjørdar, serliga um tað eisini vísir seg, at eginpeningurin, sum stórur dentur varð lagdur á í sambandi við at hesi prosjekt vórðu góðkend í fíggjarnevndini, í fleiri førum ikki hevur verið til staðar.

Viðvíkjandi byggilánt til bygginr. 53 á Skála Skipasmiðju hava løgtingsgrannskoðararnir held seg við, at umr. 40 mió.kr. longu áðrenn 1988 vóru nýttar til onnur endamál, uttan at meira varð gjort við hetta mál mótvegis Skipasmiðjuni. Løgtingsgrannskoðararnir meta, at tað í fyrsta lagi mál vera ábyrgdin hjá byggilánsveitaranum at ansa eftir, at peningurin verður nýttur til tað hann skal, og viðvíkjandi bygginr. 46 ivast løgtingsgrannskoðararnir í, um síðsta rata heytir heima í búnum.

- - - - -

Løgtingsgrannskoðararnir heittu í apríl 1993 á gjaldsstovuna um at gera eitt yvirlit yvir, hvussu nógvur peningur er goldin úr landskassanum til P/F Føroya Banka, P/F Sjóvinnubankan og útlendskar bankar sum veðhaldsútlegg, upphøggingarstuðul og serlán/kreppulán seinastu 5-10 árini. Eitt yvirlit, sum sumanlagt er uppá 1,75 mia.kr., vísir, at uml. 640 mió.kr. eru útgoldnar vegna lán í P/F Føroya Banka og P/F Sjóvinnubankanum, og meira enn 1 mia.kr. er farin til útlendskar fángevarar.

Veðhald fyri lánum til flakavirkir

Mett verður, at fleiri av teimum veðhaldum fyri lánum til tær nógvu útbyggingar av flakavirkjum, ið gjørdar eru, í stórri mun áttu at bygt á eina vinnuliga heildarmeting av tørvinum á framleiðsluorku í mun til tilfeingi/rávørunøgd.

Veðhald fyri lánum til onnur virkir

Løgtingsgrannskoðararnir átala mannagongd landsstýrisins í sambandi við fleiri av teimum veðhaldum, ið veitt vórðu.

Veðhald fyri lánum til kommunur

Løgtingsgrannskoðararnir átala, at kommunur kundu fara undir útbyggingar við stórari lántøku, uttan at neyðug loyvi til tess var givið samtlert § 39 í kommunulógini.

Veðhald fyri láni til P/F Atlantic Airways

Í sambandi við at løgtingið við lóg yvirtók stórar veðhaldsskyldur í felagnum frá Cimber Air, kunnaði fíggjarnevndin í mars 1989 løgtingið um, vísandi til fíggjar- og rakstraretlanir, at fíggjarnevndin hevði fingið ta fatan, at felagið fór at bera seg.

Vísandi til hesar upplýsingar undrast løgtingsgrannskoðararnir á, at fíggjarliga gongdin í flogfelagnum longu í 1989 gjørdist so vánalig.

Løgtingsgrannskoðararnir átala, at tað í løgmansrøðuni 1992 vórðu bornar so skeivar upplýsingar um støðuna m.a. vísandi til, at løgtingið longu í november sama ár fekk eitt lógaruppskot frá landsstýrinum, har staðfest varð, at veðhaldið uppá 70 mió.kr. varð effektivt.

Veðhald fyri lánum til IRF

Løgtingsgrannskoðararnir átala, at landsstýrið í so nógv ár legði pening út fyri lán uttan at hesin varð kravdur innafur og uttan at leggja málið fyri tingið.

Innkrevjing

Løgtingsgrannskoðararnir mugu endurtaka átalurna í seinasta álitt um landskassarokskapirnar, sum varð lagt fyri tingið í 1992, har átalað varð, at landsstýrið ikki hevði sýnt neyðugt fíggjarligt umhugsni viðvíkjandi útláns- og veðhaldsvirksemi landsins og í alt ov stóran mun unsitið givin lán og veðhald uttan at fylgja nóg væl við og taka neyðug stig mótvegis lántakarum, ið ikki hava hildið sínar skyldur. Mett verður, at hetta hevur økt munandi um landskassans tap og viðført stórar meirrentuútreiðslur og verið til skaða fyri og fordað eini menning av tí partinum av vinnuni, ið hevur royni at hildið sínar skyldur og bygt á eitt meira umhugsað grundarlag.

Løgtingsgrannskoðararnir átala unsitingina av tollkreditti og innkrevjing av brennioljugjaldi, og mæla um eina ferð til at endurskoða og broyta kunngerðina um tollkreditt, so ongi tap á hesum øki vera framyvir, og mælt verður somuleiðis til, at innkrevjingarlóggávan verður dagført. Løgtingsgrannskoðararnir átala, at stig ikki vórðu tikin mótvegis teim hundraðtals partafeløgunum, sum í mong ár hvørki lótu inn rokskap ella sjálvuppgávu.

Løgtingsgrannskoðararnir fegnast um tey stig, sum eru tikin til at bøta um innkrevjingina. Peningur er seinastu árini játtaður til eina serliga innkrevjingarskipan, sum nú verður tikin í nýtslu, talið á pantifútum er økt, skrásetingarlóggávan er broytt, so gjaldstovan kann nýta persónummarið í sínu umsiting, og lóg er samtykt, sum avmarkar møguleikar hjá skuldarum við stórari falnari almennari skuld at taka lut í útbjóðingum hjá tí almenna.

Búskaparráðið

Løgtingsgrannskoðararnir átala, at landsstýrið í nøkrum førum hevur tikið avgerð í málum, sum eru send Búskaparráðnum til ummælis, uttan at bíða eftir svari, og í øðrum førum ikki fylgt tilmælum frá ráðnum, uttan at tað greitt framgongur, hvørjar aðrar fyritreytir landsstýrið bygdi sínar avgerðir á.

Løgtingsgrannskoðararnir átala somuleiðis at landsstýrið, hóast lóg og reglugerð um búskaparráð, ikki hevur skipað so fyrt, at ráðið fekk tann leiklut tesum var ætlað.

Ymsir grunnar

Løgtingsgrannskoðararnir átala, at helmingurin av oljugjaldinum ongantið kom í oljugrunnin. Somuleiðis átala løgtingsgrannskoðararnir, vísandi til fíggjarligu støðuna hjá LØF Hitafelagnum ultimo 1989, at landsstýrið veitti eitt lán uppá heilar 35 mió.kr. úr hesum grunni í 1990, uttan at hetta varð lagt fyri tingið. Talan var um lán, sum ongin annar vildi veita.

Viðvíkjandi veðhaldsgrunninum verður átalað, at ikki nóg mikið varð avsett í grunnin.

Viðvíkjandi Gistingarhúsgrunninum átala løgtingsgrannskoðararnir, at fyriskipaða mannagongdin viðvíkjandi lánsjáttan ikki hevur verið nóg trygg, og ikki í øllum førum í tráð við reglugerðina.

Løgtingsgrannskoðararnir átala, at 25 mió.kr. eru lærtar úr orkugrunninum sum lán til beinleiðis fløgur til privat og interkommunalt virksemi og meta, at rættast hevði verið, at løgtingið beinleiðis varð biðið um heimild til at veita hesi lán.

Roknskaparviðurskifti

Vísandi til §§ 3 og 5 í Ll. nr. 33 frá 23. mars 1994 um landsins almenna roknskaparhald, sum kom í gildi 1. januar 1995, átala løgtingsgrannskoðararnir, at landsstýrið ikki enn hevur ásett grundleggjandi roknskapsreglur fyri landsumsitingina og teir landsstovnar v.m., sum lógin fevnir um.

1. viðgerð 6. desember 1995. Málið varð beint beinleiðis til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 11. desember 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 16-2-1 atkvøðum.

4 Grannskoðan av almennum roknskapum.
2 Roknskapir hjá Apoteksverki Føroya fyri árini 1993-94.

Ár 1995, mánadagin 27. november legði Atli Hansen vegna løgtingsgrannskoðararnar fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapirnar hjá Apoteksverki Føroya fyri fíggjarárini 1993-1994 við niðanfyristandandi viðmerkingum.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

1. *Lógargrundarlag:*

Apoteksverk Føroya er stovnur undir Føroya landsstýri og virkar eftir

- lóg nr. 104 frá 5. september 1988 um apoteksverkið og heilivág, sum broytt við lóg nr. 54 frá 8. mei 1991.
- kunngerð nr. 82 frá 11. august 1989 um heilivágsskrá
- kunngerð nr. 84 frá 11. august 1989 um dygd í heilivági
- kunngerð nr. 8 frá 8. mars 1991 um fyrimyndarreglur á heilivági
- kunngerð nr. 69 frá 26. juni 1991 um skrásetingarráð viðvíkjandi farmaseutiskum tilbúningi.

2. *Endamál:*

Sambæt § 1 í løgtingslóg nr. 104 frá 5. september 1988 um apoteksverkið og heilivág við seinni broytingum er Apoteksverkið stovnur undir Føroya Landsstýri.

Sambæt § 29 í lógini hevur bert apoteksverkið loyvi til at framleiða, flyta inn, flýggja út, hava á goymslu, handla við og pakka heilivág, um so er, at eitki annað er ásett í lógini ella av reglum ásettum við heimild í lógini um apoteksverkið og heilivág.

Landsapotekarin hevur smb. § 50 eftirlit við at lógin og ásetingarnar við heimild í lógini verða yvirhildnar.

3. *Fíggjaryiðurskifti:*

Sambæt § 6 í lógini um apoteksverkið og heilivág setir landsstýrið eitt apotekara á hvørjum apoteki. Sambæt § 8 skipar apotekarin fyri rekstrinum av apotekinum og hevur ábyrgd av, at virkið verður útint forsvarliga og samsvarandi galdandi ásetanum og givnum fyriskipanum.

Sambæt § 9 ásetur landsstýrið reglur um heimildir og heiti til starvsfólk, sum starvast á apotekinum.

Landsstýrið ásetur sambæt § 13 reglur um virksemið hjá teim ymsu apotekseindunum og kann ásetu reglur um rekstur teirra.

Sambæt § 18 í lógini ásetur landsstýrið reglur fyri útroknan av søluprísi.

Sambæt § 22 eru Apoteksgrunnurin, landsapotekarin og apotekini ein búskaparlig eind, tí at tey hava hvør sín rokskap. Fíggjaretlanaruppskot og takstuppskot fyri apoteksverkið verða viðgjørd av landsapotekaranum og apotekarunum í felag, og verða við fylgisviðmerkingum teirra send landsstýrinum. Fíggjaretlanaruppskotið verður sent landsstýrinum á hvørjum ári í seinasta lagi til ta tíð, landsstýrið hevur ásett.

Apoteksgrunnurin eigur sambæt § 23 vørugoymsluna, innbúgvið og føsta ognirnar hjá apoteksverkinum. Grunnurin er undir landsstýrinum og hevur til endamáls at fíggja apoteksverkið, og avlopið frá apoteksrekstrinum fellur til apoteksgrunnin.

Sambæt § 24 er landsstýrinum heimilað, vegna apoteksgrunnin, at taka tey lán, sum verukeyp fastognarkeyp, bygging og umbygging til hvørja tíð krevja.

- - -

Til tess at kunna løgtingið um ta fíggarligu gongdina, er gjørdur ein samandráttur av ársroknskapunum hjá Apoteksverki Føroya fyri 1991-1994:

4. *Yvirlit yvir rakstur 1991-1994:*

Inntøkur:	1994	1993	1992	(miðkr.) 1991
Søla – kontant	22,6	21,6	23,6	22,2
Søla – kreditt	51,1	53,1	86,7	75,9
Avsláttur	÷ 0,6	÷ 0,7	÷ 2,5	÷ 3,0
Søla ialt	73,1	74,0	107,8	95,1
Vørunýtsla	÷ 52,0	÷ 50,2	÷ 72,8	÷ 61,3
Bruttovinningur	21,1	23,8	35,0	33,8
Bruttovinningur í %	28,8%	32,2%	32,5%	35,5%
Lønir	14,2	14,3	15,3	14,8
Rakstur av fastari ogn	1,4	1,2	1,5	2,2
Kostnaður	4,2	4,0	5,0	4,9
Landsapotekarin	1,1	1,0	0,9	1,0
Útreiðslur falt	÷ 20,9	÷ 20,5	÷ 22,7	÷ 22,9
Úrslit áðrem rentur	0,2	3,3	12,3	10,9
Rentuinntøkur	1,8	2,2	2,1	1,6
Rentur til Apoteksgrunnin	0,0	0,0	÷ 1,8	÷ 1,7
Úrslit áðrem avskrivingar	2,0	5,5	12,6	10,8
Avskrivingar	2,1	2,9	3,0	3,0
Ársúrslit	÷ 0,1	2,6	9,6	7,8

5. *Yvirlit yvir gongd í fíggjarstøðuni 1991-1994:*

(mió kr)

Aktiv:	1994	1993	1992	1991
Kassa-, banka- og giropeningur v.m.	30,9	27,1	26,1	23,6
Debitorar	8,3	11,1	12,2	11,8
Vørugoymsla	10,9	12,6	15,2	13,4
Innbúgv	1,1	1,7	2,6	1,6
Bilar	0,2	0,2	0,1	0,1
Fastar ognir	12,8	12,9	10,0	9,7
Aktiv íalt	64,2	65,6	66,2	60,2
Passiv:				
Kreditorar	8,4	9,7	14,2	13,6
Millumrokning við apoteksgrunnin:				
Saldo primo	55,9	52,0	46,6	42,1
Keyp av bygningi		1,3		
Rentur til grunnin	0,0	0,0	1,8	1,7
	55,9	53,3	48,4	43,8
Ársúrslit	÷0,1	2,6	9,6	7,8
		55,8	55,9	58,0
51,6				
Inngoldið í Apoteksgrunnin	0,0	0,0	6,0	5,0
Saldo ultimo	55,8	55,9	52,0	46,6
Passiv íalt	64,2	65,6	66,2	60,2

6. *Íløguvirksemi árini 1991-1994:*

Í tíðarskeiðinum 1991 til 1994 eru gjørdar íløgur í bilar, innbúgv (serliga HDV) og bygningar. Hesar íløgur eru býtar soleiðis:

(í 1.000 kr)

	1994	1993	1992	1991
Innbúgv og edv	821	1.488	3.743	2.781
Bilar	109	47	219	0
Føst ogn	501	3.185	510	106
Íalt	1.431	4.720	4.472	2.887

7. *Apoteksgrunnurin:*

Samb. § 23 í løgtingslóg um apoteksverk og heilivág er apoteksgrunnurin undir landsstýrinum og bevur til endamáls at fíggja apoteksverkið. Apoteksgrunnurin eigur ognirnar hjá apoteksverkinum, og avlopið hjá apoteksverkinum fellur til grunnin.

Rokniskapur grunsins verður lørdur av Føroya Gjaldstovu, og framgangur av landsrokniskapinum sum ein internur grunnur. Til tess at kunna løgtingið um fíggjarligu gongdina í grunninum, er gjørdur ein summdráttur av rokniskapunum frá 1991-1994:

(mió.kr.)

Virði:	1994	1993	1992	1991
Millumrokning við Apoteksverkið	55,8	55,9	52,0	46,6
Innistandandi í peningastovnum	0,0	16,2	16,5	9,9
Millumrokning við landskassan	16,1	÷ 0,1	0,1	0,0
	71,9	72,0	68,6	56,5
Eginogn:				
Saldo 1. januar	72,0	68,5	56,5	46,9
Rentuinntøkur frá Apoteksverkinum	0,0	0,0	2,1	1,7
Rentuinntøkur av innistandandi í peningast.	0,1	1,0	0,3	0,1
Ársúrslit Apoteksverksins	÷ 0,1	2,6	9,6	7,8
Løgur, samsýningar o.a.	÷ 0,1	÷ 0,1	0,0	0,0
	71,9	72,0	68,5	56,5

Fram til 1993 varð í roknskapinum hjá Apoteksverkinum útreiðsluførd ein roknað renta uppá 4% av eginogrini, og varð henda renta inntøkuførd í Apoteksgrunninum.

Landsstýrið hevur síðani gjørt av, eftir tilmæli frá ráðleggingarnevndini, at henda skipan skuldi halda uppat frá 1993. Apoteksgrunnurin hevur seinastu árini havt góðar 16 mió.kr. innistandandi í peningastovnum. Sambært bókhaldið á gjaldstovuni vórðu hesar konti gjørdar upp í februar 1994, og peningurin fluttur í landsbankan. Síðani er ongin renta góðskrivað Apoteksgrunninum. Løgtingsgrannskoðararnir hava biðið gjaldstovuna um eina frágreiðing hesum viðvíkjandi.

8. *Roknskapargrannskoðarin/viðmerkingar:*

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið ársroknskapirnar og grannskoðanarprotokollirnar til tess at vissa seg um, at rætt er farið fram bókhaldsliga og roknskaparliga hjá stovninum.

9. *Viðmerkingar:*

Í seinasta áltti løgtingsgrannskoðaranna daglest 7. april 1994 viðvíkjandi roknskapinum hjá apoteksverkinum fyri árið 1992 varð mett, at Apoteksverkið seinnu árini hevði havt ov stórt yvirskot og uppsamlað nógvan pening, og mælt varð tí til, at umhugsa at nýtt ein part av uppsamlaða peninginum til at lækka prísirnar.

Síðani 1992 er ársúrslitið hjá Apoteksverkinum fallið munandi, og í 1994 var talan um eitt minni undirskot. Bruttovinningurin er síðani 1991 lækkaður úr 35,5% til 28,8%.

Uppá fyrispurning um orsøkina til tað stóra fallið í inntøkunum síðani 1992 vísir Landsapotekarin á, at við kunngerðum landsstýrisins nr. 113/1992, nr. 118/1993 og nr. 123/1994 varð vinningurin niðursettur, samstundis sum vinningurin av søla til sjúkrahús, ali- og landbúnað gjørdist lægri enn til heilivág annars. Eisini eru seldu nøgdirnar minkaðar, og ger hetta seg serliga galdandi fyri alivinnuna, har sølan er lækkað frá uml. 35 mió.kr. í 1992 til uml. 10 mió.kr. í 1993 og 1994.

Uppá fyrispurning hevur landsstýrið áður upplýst, at tað tekur undir við Ráðleggingarnevndini, sum mælir til, at peningurin, ið uppsamlaður er í Apoteksverkinum skilabest kann nýtast til at styrkja/tryggja fíggjarligu støðu apoteksverksins móti møguligum framtíðar rakstrar- og fíggjarligum bakkøstum og til, í samráðingum við vørukreditorar, at fáa munandi avsláttir til bata fyri rakstrargrundarlag apoteksverksins framyvir, og á henda hátt kunna lækka prísin á heilivági. Harumframt hevur landsstýrið upplýst, at tað er sinnað framhaldandi av sínum eintingum at fremja tiltøk til lækkan av søluprísinum á heilivági.

1. viðgerð 1. desember 1995. Málið varð beint beinleiðis til 2. viðgerð uttan nevnd.arviðgerð.

2. viðgerð 5. desember 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 28-0-0 atkvøðum.

4 Grannskoðan av almennum roknskapum.
3 Roknskapir hjá Útvarpi Føroya fyri árini 1993-94.

Ár 1995, mánudagin 27. november legði Atli Hansen vegna løgtingsgrannskoðararnar fram seljáðandi

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapirnar hjá Útvarpi Føroya fyri fíggjarárini 1993-1994 við niðanfyristandandi viðmerkingum.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

1. Lógargrundarlag:

Útvarp Føroya varð sett á stovn við Ll. nr. 23 frá 28.3.1956 við broytingum í Ll. nr. 28 frá 17.5.1961, Ll. nr. 22 frá 9.4.1964, Ll. nr. 32 frá 27.5.1968, Ll. nr. 182 frá 18.12.1992 og Ll. nr. 88 frá 13.6.1995.

Arbeiðið hjá útvarpsnevndini er staðfest við Ll. nr. 11 frá 14.2.1957 við broytingum í Ll. nr. 38 frá 25.5.1963, Ll. nr. 25 frá 10.6.1971, Ll. nr. 87 frá 13.6.1995 og reglugerð nr. 51 frá 18.7.1957.

2. Endamál:

Sambært § 2, 1. stk. í reglugerð um starv útvarpsnevndarinnar fyrisetur nevndin reglur, ið hon leiðir vera neyðugar, við tí endamáli at tað, sum útvarpað verður, hevur fjølbroytt, mentunarligt og upplýsandi innihald, og at hugsunarfrælsi, rættsinni og javnaður móti øllum flokkum og stevnum í almennum málum, vinnustevnum, felløgum og einstakum mannum skulu ráða í útvarpinum.

3. Fíggjarviðurskifti:

Sambært lóg nr. 23 frá 28.3.1956 við seinni broytingum, setir landsstýrið fyristøðumann, ið hevur dagliga stýri útvarpsins eftir reglugerð, ið landsstýrið fyrisetur. Landsstýrið setur starvsfólk eftir tilmæli fyristøðumansins. Løntirnar hjá fyristøðumanni og starvsfólki verða ásettar av landsstýrinum sambært § 2.

Smb. § 3 skal gjald rindast til útvarpið av hvørjum radiomóttakara í landinum. Landsstýrið fyrisetur gjaldið fyri eitt ár í senn.

Sambært § 5 í lógini ger fyristøðumaðurin uppskot til fíggjaratlan fyri fíggjarárið og sendir landsstýrinum uppskotið inman 1. januar. Fíggjaratlanin verður tikin sum serstakur liður í fíggjarlóg landsins. Inntøkur útvarpsins verða bert at nýta til útvarpsendamál.

Sambært § 6 í reglugerðini heitir landsstýrið á nevndina og fer umráði viðvíkjandi setan av útvarpsstjóra og starvsfólki, fíggjaratlan útvarpsins, stødlina á útvarpsgjaldi v.m.

Sambært § 2 hevur landsstýrið allan avgerðarrætin fyri øllum fíggjarligum, útvarpinum viðvíkjandi.

- - - - -

Til tess at kunna løgtingið um ta fíggjarligu gongdina hjá Útvarpi Føroya er gjørdur ein samanstráttur av ársroknskapunum fyri 1990-1994:

4. *Yvirlit yvir rekstur 1990-1994:*

Inntøkur	1994	1993	1992	1991	miðk. 1990
Útvarpsgjald	12.333	13.923	15.715	13.951	11.718
Kunngerðir	3.491	3.965	5.290	4.508	4.394
Kvøðuljómar	99	112	112	125	113
Rentur	632	1.059	1.481	1.072	1.112
Ymiskt	387	242	58	131	100
	16.943	19.301	22.656	19.787	17.437
Vinningur V-4	2.754	2.786	2.414	2.974	2.857
	19.697	22.087	25.070	22.761	20.294
Útreiðslur					
Útvarpsstøðirnar og studlið	1.956	2.348	1.481	528	904
Útreiðslur viðv. útvarping:					
lønir	6.264	6.483	6.819	6.787	5.806
samsýningar	2.692	2.487	2.381	2.519	2.713
annað	2.992	3.177	3.197	3.105	2.208
Stjórnarútreiðslur:					
lønir	1.692	1.809	1.819	1.958	1.774
annað	2.291	2.494	2.361	2.630	2.298
Útvarpsnevndin	52	60	49	89	56
Avsett t.umv. og ymisk prosjekt	0	0	0	1.600	0
Avskr. av húsi (avdráttir)	646	580	1.735	740	1.841
Avskrivingar av øðrum ognum	0	0	2.007	500	300
Avskrivingar av eftirstøðum	468	585	519	420	280
Rentur íroknað kurstap	2.363	2.609	2.507	1.835	2.086
	21.416	22.632	24.875	22.706	20.266
Úrslit	÷1.719	÷545	195	55	28

5. *Yvirlit yvir gongd í fíggjarstøðuni 1990-1993:*

Aktiv	1994	1993	1992	1991	miðk. 1990
Innistandandi í peningastovnum	8.853	12.668	17.920	16.411	15.396
Skuldarar:					
eftirstøður í útvarpsgjald	5.715	8.031	7.392	6.321	6.362
aðrir skuldarar	728	938	921	1.357	1.325
Umferðarfe	15.296	21.637	26.233	24.089	23.083
Útvarpshúsið	10.368	10.819	11.102	12.788	13.474
Aðrar ognir	1.563	387	0	1.630	1.562
Støðisfe	11.931	11.206	11.102	14.418	15.036
Aktiv samanlagt	27.227	32.843	37.335	38.507	38.119
Passiv					
Ognarar	1.101	1.400	2.343	1.892	1.779
Millumrokning við landskassan	0	0	0	4.631	4.631
Lán	2.125	5.230	8.234	9.970	10.885
Freinmand fíggjan	3.226	6.630	10.577	16.493	17.295

Eginogn:					
saldo pr. 1.1.	24.660	25.205	20.379	20.324	20.296
úrslit	÷1.719	÷545	195	55	28
eftirgeving av millumroko	-	-	4.631	0	0
	22.941	24.660	25.205	20.379	20.324
avsett til Útvarpshús	0	0	0	35	500
avsett til umvælan	260	753	753	800	0
avsett til ymisk prosjekt	800	800	800	800	0
Eginfígging	24.001	26.213	26.758	22.014	20.824
Passiv samanlagt	27.227	32.843	37.335	38.507	38.119

6. *Seinasta álit løgtingsgrannskoðaranna:*

Í seinasta áliti løgtingsgrannskoðaranna dagfest 22. februar 1994 viðvíkjandi roknskapinum fyri árið 1992 varð uttur heitt á landsstýrið um at endurskoða løgtingslóg um útvarp, m.a. vísandi til, at ásetingin av útvarpsgjaldi ikki er í tráð við lógina.

Løgtingsgrannskoðararnir vístu á, at útvarpið hevði 18 mió.kr. innistandandi ultimo 1992, og løgtingsgrannskoðararnir átaladu, at landsstýrið, við góðkenning frá fíggjarnevndini, hevði eftirgivið 4,6 mió.kr., uttan at hetta varð gjørt við heimild í serstakari lóg ella tikið við á fíggjarlóg/eykafíggjarlóg.

7. *Roknskapargrannskoðanin:*

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið ársroknskapin og grannskoðanarprotokollina, til tess at vissa seg um at rætt er farið fram bókhaldsliga og roknskaparliga hjá stovninum.

8. *Viðmerkingar:*

Aftur í 1993 og 1994 hevur roknskapargrannskoðanin, eins og árini frammanundan m.a. vísandi til nýtta roknskaparháttin viðvíkjandi avskrivingum og avsetingum víst á, at neyðugt er at fáa eina fasta skipan fyri, hvussu almennir roknskapir verða uppsettir, tí sum er verða hesir ikki settir upp á sama hátt, og tí er trupult at samanbera stovnar.

Ein partur av útreiðslum útvarpsins í 1994 eru bókaðar beinleiðis á eginognina, eftirsum útvarpið í 1991 setti av 1,6 mió.kr. til umvælan og ymisk prosjekt. Løgtingsgrannskoðararnir meta ikki tað var rætt at útreiðsluføra avsetingar til framtíðar útreiðslur. Í 1993 og 1994 eru einans avskrivað uppá bygningin. Onki er avskrivað uppá aðrar íløgur uppá uml. 1,6 mió.kr., sum eru gjørdar hesi árini.

Uppá fyrispurning um avskrivingar av føstu ognum útvarpsins, sum ikki tykjast gjørdar eftir einari fastari skipan, upplýsir leiðsla útvarpsins, at avskrivingarnar hava verið lagaðar eftir broytingunum í inntøkunum. Góð inntøkuár hevur verið rúmd fyri størri avskrivingum, meðan avskrivingarnar hava verið minni lakari inntøkuár. Av tí at ongar reglur eru fyri landsins almenna roknskaparhald, hevur útvarpið í síni tíð ásett ein praksis, sum er fylgdur síðani. Víst verður eisini á, at støðan er tann sama á fleiri øðrum økjum, tí lógin um útvarp frá 1956 ikki longur er tíðarhóskandi og tí ikki kann fylgjast til fulnar, og landsstýrið hevur heldur ikki gjørt nakra reglugerð fyri stovnin. Síðani 1990 hevur útvarpið javnan gjørt landsstýrið vart við, at hesi viðurskifti mugu fáast í rættlag, men higartil er kortini onki hent.

Vísandi til omanfyristandandi mæla løgtingsgrannskoðararnir enn einaferð til, at løgtingslóg um útvarp, og reglugerð um starv útvarpsnevndarinnar, verða endurskoðaðar og tillagaðar nútíðar viðurskiftunum, og at ásettar verða nærri roknskaparreglur fyri almennar stovnar, harundir tilknýtið til fíggjarlógina.

Landsstýrið hevur upplýst, at uppskot til nýggja lóg um útvarp eftir ætlanini verður at leggja fyri løgtingið í komandi mánaði.

1. viðgerð 1. desember 1995. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 22. februar 1996 legði fram soljóðandi

á l i t

Málið er lagt fram av løgtingsgrannskoðarunum tann 27. november 1995 og eftir 1. viðgerð tann 1. desember 1995 beint í fíggjarnevndina.

Í frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum verður víst á seinasta álit løgtingsgrannskoðaranna, har m.a verður sagt: "*Løgtingsgrannskoðararnir vístu á, at útvarpið hevði 18 mió. kr. innistandandi ultimo 1992, og løgtingsgrannskoðararnir átalaðu, at landsstýrið, við góðkenning frá fíggjarnevndini, hevði eftirgivið 4,6 mió. kr., utan at hetta varð gjørt við heimild í serstakari lóg ella tikið við á fíggjarlóg/eykafíggjarlóg*".

Undir 1. viðgerð av málinum varð ført fram, at hetta ikki var samsvaradi samtyktina í fíggjarnevndini.

Gongdin í málinum er henda:

Landsstýrið sigur í skrivi til fíggjarnevndina, dagfest 31. januar 1992, frá, at landsstýrið á fundi 27. januar 1992 hevði samtykt at søkja fíggjarnevndina um, at millumrokingin hjá útvarpinum við landskassan verður strikað. Í skrivi frá Útvarp Føroya, dagfest 30. januar 1992, verður upplýst, at skuldin er kr. 4.631.328,26. Í skrivinum frá útvarpinum verður sagt, at tá útvarpshúsið varð bygt veðhelt landsstýrið fyri lánum, og av tí, at peningur ikki varð játtaður á fíggjarlógini til rentur og avdrátt av hesum lánum, gjørdust veðhald effektiv.

Fíggjarnevndin spurdi landsstýrið, eftir hvørjari lógarheimild landsstýrið hevði samtykt at eftirgeva skuldina hjá útvarpinum, og varð upplýst fyri nevndini, at heimild var í løgtingslóg nr. 28 frá 30. apríl 1987 um eftirgeving av ella gjaldskipan fyri skuld til landskassan. Út frá hesum játtaði ein samd fíggjarnevnd á fundi tann 19. februar 1992 umsókn landsstýrisins.

Í skrivi til fíggjarnevndina, dagfest 3. juli 1992, frá Løgtingsgrannskoðarunum verður sagt, at teir meta ikki, at tað er heimild til at eftirgeva skuldina til landskassan sambært nevndu lóg og heita á fíggjarnevndina um at viðgera spurningin av nýggjum. Í skrivinum verður víst á, at sambært ársroknskapin hjá Útvarpi Føroya standa 16,4 mió. kr. á bankabók pr. 31/12-1991. Skrivið frá løgtingsgrannskoðarunum verður 6. juli 1992 sent til landsstýrið, har biðið verður um nágreinliga frágreiðing um heimildargrundarlagið fyri tilmæli landsstýrisins.

Løgtingsgrannskoðararnir spyrja í skrivi dagfest 25. juni 1993 eftir málinum og á fundi í fíggarnevndini 8. juli 1993 verður samtykt at heita á landsstýrið um víðari viðgerð av málinum og svar til fíggjarnevndina.

Grannskoðarin minnir í skrivum, dagfest 28. oktober 1993 og 25. november 1993, fíggjarnevndini á málið.

Einki nýtt tilmæli í málinum kemur frá landsstýrinum og fíggjarnevndin samtykkir á fundi 11. november 1993: *"Semja í fíggjarnevndini um at mæla landsstýrinum til, at skuldin verður mótroknað í innskotsogn hjá útvarpinum og at senda fíggjarnevndini brev, tá avgerð landsstýrisins er tikin"*.

Á fundi í landsstýrinum tann 23. juni 1994 kemur málið um millumrokning hjá Útvarpi Føroya við landskassan til viðgerðar og tá verður samtykt at fylgja avgerðini hjá fíggjarnevndini og heimila gjaldstovuni at gera neyðugar bókingar. Í skrivi frá landsstýrinum til fíggjarnevndina, dagfest 5. september 1994, verður sagt frá, at gjaldstovan er biðin um at bóka skuldina, sum Útvarp Føroya hevur til landskassan sum eginogn útvarpsins.

Fíggjarnevndin sendi skriv landsstýrisins landsgrannskoðaranum til ummælis og í svarskrivi, dagfest 17. oktober 1994, sigur landsgrannskoðarin m.a.: *"Í sambandi við at løgtingið í 1994 góðkendi roknskapin hjá Útvarpi Føroya fyri 1992 varð átalað, at útvarpið var sloppið undan at afturrinda tær 4,6 mió. kr., uttan at løgtingið hevði haft høvi til at taka stoðu til henda spurning t.d. í sambandi við viðger av fíggjarlógini ella eykafíggjarlógini 1992. Vísandi til, at nú løgtingið hevur góðkent roknskapin hjá Útvarpi Føroya fyri 1992 og átalað gongdina í hesum máli, verður ikki mett at fíggjarnevndin kann gera meira við málið."*

Við hesum viðmerkingum mælir ein samd nevnd løgtinginum til at góðkenna roknskapirnar hjá Útvarpi Føroya fyri árini 1993-94.

2. viðgerð 7. mars 1996. Uppskotið varð endaliga samtykt við 21-0-0 atkvøðum.

4 Grannskoðan av almennum roknskapum.
4 Roknskapir hjá Sjónvarpi Føroya fyri árini 1993-94.

Ár 1995, mánadagin 27. november legði Atli Hansen vegna løgtingsgrannskoðararnar fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapirnar hjá Sjónvarpi Føroya fyri fíggjarárini 1993 og 1994 við niðanfyristandandi viðmerkingum.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

1. Lógargrundarlag:

Tað almenna sjónvarpið varð sett á stovn sambært løgtingslóg nr. 77 frá 21. mei 1982 við broytingum í Ll. nr. 183 frá 18.12.1992 og Ll. nr. 85 frá 13.6.1995.

Sambært § 6 í lógini varð lóg nr. 11 frá 14. februar 1957 um útvarpsnevnd og reglugerðin um starv útvarpsnevndarinnar tilsvarandi at galda fyri sjónvarpsnevndina.

2. Endamál:

Sambært § 1 í lógini hevur løgtingið einkarrætt til sjónvarpssendingar og setir á stovn Sjónvarp Føroya.

Sjónvarp Føroya hevur til endamáls at hava objektivan, sakligan og upplýsandi tíðindaflutning og sendingar annars, ið varðveita og fjálga um føroyska mentan, átrúnað og siðaheru.

3. Fíggjarviðurskifti:

Eftir tilmæli frá sjónvarpsnevndini setir landsstýrið, sambært § 2 í lógini, í starv ella loysir úr starvi fyristøðumann, ið hevur dagligu leiðslu sjónvarpsins um hendi, eftir reglugerð ið landsstýrið fyrisetur.

Sambært § 4 skal til sjónvarpið rindast gjald at hvørjum sjónvarpsmóttakara í landinum og umborð í skipum, ið eru skrásett í Føroyum. Landsstýrið fyrisetur gjaldið fyri eitt ár í senn.

Sambært § 5 í lógini ger fyristøðumaðurin uppskot til góðkenningar til fíggjaraetlan fyri fíggjarárið og sendir landsstýrinum uppskotið. Inntøkur sjónvarpsins verða bert at nýta til sjónvarpsendamál.

- - - - -

Til tess at kunna um ta fíggjarligu gongdina hjá Sjónvarpi Føroya er gjørdur ein samandráttur av ársroknskapunum fyri 1990-94:

4. Yvirlit yvir rakstur 1990-1994:

Inntøkur	1994	1993	1992	1991	1990
Sjónvarpsgjald	13.202	12.956	12.636	12.588	12.889
Lýsingar	2.984	2.824	3.006	2.207	1.291
Sektarpeningur	121	134	259	93	61
Søla og leiga av sjónbondum	81	98	155	226	160
Inntøkur ialt	16.388	16.012	16.056	15.114	14.401
Útreiðslur					
Sjónvarpsstøðirnar og studiið	1.662	1.776	2.130	1.543	1.836
Útreiðslur viðv. sendingum:					
lønir	6.792	6.784	7.394	7.249	6.962
samsýningar	894	1.109	1.019	883	1.013
annað	3.638	3.282	3.715	2.752	2.487

Stjórnarútreiðslur:					
launir	1.849	1.759	2.015	1.907	1.474
annað	1.969	1.639	1.926	2.088	2.880
Sjónvarpsnevndin	64	74	59	65	65
Avskrivingar, útgerð o.l.	0	0	0	469	-
Avskr. og -setingar av eftirstøðum	650	1.600	1.400	1.361	559
Rentur	÷150	÷228	÷163	60	÷17
Útreiðslur falt	17.368	17.795	19.485	18.377	17.259
Rakstrarhall	980	1.783	3.429	3.233	2.858
Landskassastuðningur	1.000	2.000	3.476	3.500	3.000
Samlað úrslit	20	217	47	237	142

5. *Yvirlit yvir gongd í fíggjarstøðuni 1990-1994:*

Aktiv	1994	1993	1992	1991	1990
Innistandandi í peningastovnum	2.248	2.505	1.660	232	61
Skuldarar:					
eftirstøður fjsjónvarpsgjald	702	676	1.552	3.892	5.502
aðrir skuldarar	164	42	103	59	31
Umferðarfæ	3.114	3.223	3.315	4.183	5.594
Rakstrargøgn	0	0	0	0	269
Stødisfæ	0	0	0	0	269
Aktiv samanlagt	3.114	3.223	3.315	4.183	5.863
Passiv					
Ognarar	2.590	2.219	2.028	2.437	3.083
Lán Føroya landsstýri	0	500	1.000	1.500	2.000
Bankaskuld	0	0	0	6	777
Fremmand fíggjan	2.590	2.719	3.028	3.943	5.860
Eginogn:					
saldo pr. 1.1.	504	287	240	3	+139
flutt frá rakstri	20	217	47	237	142
Eginfíggjing	524	504	287	240	3
Passiv samanlagt	3.114	3.223	3.315	4.183	5.863

6. *Seinasta álit løgtingsgrannskoðaranna:*

Í seinasta áliti løgtingsgrannskoðaranna dagfest 22. februar 1994 viðvíkjandi rokskapinum hjá Sjónvarpi Føroya fyri árið 1992 varð aftur heitt á landsstýrið um at endurskoða og tillaga løgtingslóg um sjónvarp og reglugerð, um starv sjónvarpsnevndarinnar, til nútíðar viðurskifti.

7. *Rokskapargrannskoðanin:*

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið ársrokskapin og grannskoðanarprotokollina til tess at vissa seg um, at rætt er farið fram bókhaldsliga og rokskaparliga hjá stovninum.

8. *Viðmerkingar:*

Bæði rokskapargrannskoðanin og løgtingsgrannskoðararnir hava áður víst á, at neyðugt er at fáa eina fasta skipan fyri, hvussu almennir rokskapir verða uppsettir, so hesir geva eina meira fullfíggjaða mynd av fíggjarliga virksemínum og kunnu samanberast. Nevnast kann, at nýti rokskaparhátturin í útvarpinum og sjónvarpinum er sera ymiskur, tá ræður um íløgur, fígging, avskrivingar og avsetingar. Meginparturin av íløgunum til Sjónvarp Føroya eru fíggjaðar úr serligum grunnum, sum vóru avtiknir við løgtingslóg nr. 33 frá 27. mars 1992. Í áliti løgtingsgrannskoðarannu dagfest 18. februar 1993 viðvíkjandi rokskapum Sjónarpsins fyri árini 1989-1991 vóru hesi viðurskifti nærri útgreinað.

Mælt verður enn einaferð til, at løgtingslóg um sjónvarp og reglugerð um starv sjónvarpsnevndarinnar verða endurskoðaðar og tillagaðar nútíðar viðurskiftunum, og at ásettar verða nærri rokskaparreglur fyri almennar stovnar, harundir tilknýtið til fíggjarlógina.

Landsstýrið hevur upplýst, at uppskot til nýggja lóg um ilvarp eftir ettanini verður at leggja fyri løgtingið í komandi mánaði.

1. viðgerð 1. desember 1995. Málið varð beint beinleiðis til 2. viðgerð uttan nevndarvíðgerð.

2. viðgerð 5. desember 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 28-0-0 atkvøðum.

4 Grannskoðan av almennum roknskapum.
5 Roknskapir hjá Føroya Jarðargrunni fyri árini 1993 og 1994

Ár 1995, hósdagin 21. desember legði Atli Hansen vegna løgtingsgrannskoðararnar fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapirnar hjá Føroya Jarðargrunni fyri fíggjarárini 1993 og 1994 við niðanfyristandandi viðmerkingum.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

1. Lógargrundarlag:

Lógargrundarlagið fyri virki grunsins er:

- Løgtingslóg nr. 59 frá 9. mei 1988 um landsjørð (sett í gildi við kunngerð nr. 43 frá 11.5.1989) við broytingum í Ll. nr. 65 frá 12.6.1990, Ll. nr. 49 frá 8.5.1991 og Ll. nr. 58 frá 26.3.1993
- Kunngerð nr. 122 frá 21. juli 1992 um festi og ásetan av festileigu og kunngerð nr. 164 frá 26. august 1993 um reglur fyri Jarðarráðið.
- Ríkislóg nr. 174 frá 25. mei 1937 "om jordbrugets fremme", við tilhoyrandi "reglement nr. 120 for landbrugsrådet nedsat i henhold til lov nr. 174 af 24. mai 1937 om jordbrugets fremme."

Løgtingslógin ásetur ein karm um fyrisitingina av landsjørðini og var ætlað sum 1. partur av tillagingini av tí gomlu lógini frá 1937. Løgtingslógin umfatar ein part av ríkislógini, nevniliga §§ 1-7 og §§ 10-27. Sostatt eru §§ 8-9 og §§ 28-61 í ríkislógini framvegis í gildi.

Sambært løgtingslógini er álagt landsstýrinum við kunngerð at áseta nærri reglur fyri m.a.:
- Jarðarráðið sjálvt
- Ásetan av leigu
- Framleiðsluskyldu
- Endurgjald til fráfarandi festara fyri egnar fløgur.

Í tí partinum av donsku lógini, sum framvegis er í gildi, eru ásettar reglur um umsiting av Jarðargrunninum, harundir keyp av jørð og lánsveiting úr grunninum og um studningsskipanir.

2. Endamál:

Føroya Jarðarráð hevur tríggjar høvuðsuppgávur:

- fyrisiting av landsjørðini
- umsiting av Jarðargrunninum
- umsiting av studningsskipanum

3. Fíggjarviðurskifti:

Fíggjarliga grundarlagið undir virki ráðsins eru

- studningur til Jarðargrunnin (flogu- og rentustudningur),
- ymsir studningar, ið ráðið umsitur
- søla av festijørð v.m.
- rentuinntekur.

- - - -

Til tess at kunna løgtingið um ta fíggjarligu gongdina í Jarðargrunninum, er gjørdur ein samandráttur av ársroknskapunum fyri 1990-1994:

4. *Yvirlit yvir rakstur 1990-1994:*

(Mió.kr.)

	1994	1993	1992	1991	1990
Rentuinntekur v.m.	6,7	7,2	6,7	5,7	5,6
÷ Fyrisitingarútreiðslur	1,9	1,6	1,7	1,5	2,2
	4,8	5,6	5,0	4,2	3,4
÷ Avsett til tap uppá útlán	0,0	1,0	3,0	0,0	0,0
÷ Avskrivað tap uppá lán	0,8	4,0	0,0	1,7	0,0
Rakstrarúrslit	4,0	0,6	2,0	2,5	3,4

Viðmerkingar til rakstrarroknskapin

Í rakstrarroknskapinum verður fløgustudningur úr landskassanum til grunnin ikki tikin við, men verður besin inntøkuførdur beinleiðis undir eginognini. Rentutreiðslurnar og rentustudningurin úr landskassanum til grunnin verður heldur ikki tikin við í rakstrarroknskapinum, men á einari serligari studningskonto.

Søla av jørð og aðrar inntøkur og stuðul úr Jarðargrunninum til festarar verður ikki tikin við í rakstrarroknskapinum, men vístí notu til eina sundlaða »festikonto« undir eginognini. Stuðulin úr landskassanum til tær ymsu studningsskipanirnar og studningsútgjaldingarnar til festini verða ikki tikin við í rakstrarroknskapin, men gongur fram av eini notu til »studningskonti« undir passivunum.

Í roknskapinum fyri 1992 vórðu avsettar 3 mió.kr. til tap uppá útlán, og vórðu allar hesar 3 mió.kr. útreiðsluførdar yvir raksturin. Í 1993 vórðu avsettar 37 mió.kr. alltat til tap uppá útlán. Av hesum varð 1 mió.kr. útreiðsluførd yvir raksturin, meðan 36 mió.kr. vórðu førdar beinleiðis yvir eginognina.

Um allar avsetingarnar ímóti tapum uppá útlán vórðu útreiðsluførdar yvir raksturin, hevði rakstrarroknskapurin fyri 1993 vístí eitt hall uppá umr. 35,5 mió.kr. í staðin fyri eitt yvirskot uppá umr. 0,5 mió.kr.

Uppá fyrispurning um, hví avsetingarnar uppá 36 mió.kr. verða førdar yvir eginognina, verður upplýst, at talan ikki er um eina avseting ímóti tapum uppá »styturi sikt«, men um eina serliga avseting ímóti framtíðar tapum, sum ikki kunnu útgreinast á ávísar skuldarar og ikki kunnu gerast upp. Í roknskapinum fyri 1993 verður upplýst, at ein sokallað engagementsgjøgnumgongd verður gjørd, soleiðis at metast og avsetast kann uppá tey einstøku tilgóðabevarandini í komandi ársroknskapi.

Í sambandi við gjøgnumgongdina av 1994-roknskapinum heldu løgtingsgrannskoðararnir seg við, at tað av grannskoðanarátekningini gongur fram, at tann sokallaða engagementsgjøgnumgongdin ikki er liðug, og at grannskoðanin er samd við ráðnum í, at tað ivaleyst verður truplari í framtíðini at fáa rentur, avdráttir og leigu inn, og at tað tí er ein spurningur um avsetingin ímóti tapi uppá 40 mió.kr. er nóg stór.

Løgtingsgrannskoðararnir hava spurt Jarðarráðið um hvussu gjøgnumgongd er liðug og um Jarðarráðið hevur nakað yvirlit yvir fíggjarligu viðurskiftini hjá teim einstøku festunum.

Jarðarráðið upplýsir, at engagementsgjøgnumgongdin ikki er liðug, og at Jarðarráðið ikki hevur nakað beinleiðis yvirlit yvir fíggjarligu viðurskiftini hjá teim einstøku festunum, men at hjá teimum festum, hvar fígg

ing fyrtiliggur, er yvirlitið í fyrsta lagi grundað á, hvussu hesi halda sínar skyldur yvirfyri Jarðargrunninum.

5. *Yvirlit yvir gongd í fíggjarstøðuni 1990-1994:*

(Mió.kr.)

Nota AKTIV:	1994	1993	1992	1991	1990
1 Útlán og eftirstøður	150	156	156	155	149
÷ Avsett til tap uppá útlán	40	40	3	0	0
	110	116	153	155	149
Innistandandi, virðisbrøv v.m.	43	44	44	29	28
Onnur aktiv	1	1	1	1	1
Aktiv samanlagt	154	161	198	185	178
PASSIV:					
Eginpeningur: Grunnurin	67	61	95	90	84
2 Festikonto	81	81	82	76	74
ialt	148	142	177	166	158
Langfreistað skuld	3	17	23	17	18
3 Stuttfreistað skuld/studningskonti	3	2	÷2	2	2
Passiv samanlagt	154	161	198	185	178

Nota 1. *Útlán og eftirstøður*

Útlánini kunnu útgreinast til hesi endamál:

(mió.kr.)

	1994	1993	1992	1991
Fjós	87	87	87	82
Seyðahús	9	10	11	11
Mjólkarvirkið	17	18	13	11
Traktorur og maskinur	7	8	9	10
Sethús	5	6	5	6
Kommunur	3	5	7	8
Vakstrarhús	4	4	4	5
Rakstrarlán	1	1	2	3
Grísagarðurin	0	0	3	3
Onnur lán	2	3	6	4
Samanlagt	135	142	147	143
Falnit avdráttir og rentur	15	14	9	12
	150	156	156	155
Avsett til tap	÷40	÷40	÷3	÷0
	110	116	153	155

Nota 2. *Festikonto*

Niðanfyristandandi er gjørdur ein samandráttur av inntøkum og útgjaldingum á festikonto árini 1990-1994. Í serligari notu í rokniskapinum eru inntøkumar sundurgreinaðar.

(mió.kr.)

	1994	1993	1992	1991	1990
Saldo, primo	81	82	76	74	77
Søla av jørð v.m.	+2	+2	+9	+7	+9
Útgoldið til festarar, netto	÷2	÷3	÷3	÷5	÷7
Saldo ultimo	81	81	82	76	74

Viðmerkingar til festikonto

Roknskapurin vísir ikki til, hvørji endamál útgjaldingarnar av festikonto fara til.

Sambært § 5 í kunngerð nr. 164 frá 26. august 1993 um reglur fyri Jarðarráðið verður peningurin fyri sølu av jørð v.m. goldin í Jarðargrunnin og har bókaður á konto fyri hvørt festi sær. Jarðarráðið kann veita fíggjarligan stuðul til íløgur á festinum við peningi av festikonto, og umsóknir um fíggjarligan stuðul av festikonto verða viðgjørdar av ráðnum eftir sonnu reglum sum umsóknir um lán.

Sostatt hevur hvørt festi sína festikonto, og Jarðarráðið upplýsir, at hetta er orsøkin til, at inntøkur og útreiðslur viðvíkjandi hesum konti ikki eru tiknar við í rakstrarroknskapi Jarðargrunsins.

Sambært § 4 í kunngerð landsstýrisins nr. 122 frá 21. juli 1992 um festi hevur fráfarandi festari ræt til endurgjald frá komandi festara fyri ognar varandi íløgur, sum gjørdar eru á fastar ognir, sum hoyra festinum til, eitt nú á sethús, hjallar, fjós, maskinhús, neyst, seyðahúsum, í hagn, vegir og á sjálva landbúnaðarjørðina.

Uppá fyrispurning upplýsir Jarðarráðið, at endurgjaldsspurningurin er eitt mál millum fráfarandi og komandi festara, men Jarðarráðið kann, eftir umsókn og góðkenning av endurgjaldinum, fíggja hetta endurgjald sum lán ella av festikonto. Verður fíggingin latin av festikonto, verður innstøðan hækkað samsvarandi.

Nota 3. *Studningskonti*

Studningurin til landbúnaðin verður játtaður á fíggjarlógini og fluttur Jarðargrunninum. Landsstýrið býtir játtanina út á tær ymsu studningsskipanir í samráð við Jarðarráðið.

Niðanfyri eru vístar tær upphæddir sum í 1993 og 1994 eru játtaðar til tær ymsu studningsskipanirnar. Til samanberingar eru tølini fyri 1990-1992 tikin við:

(mill.kr.)

	1994	1993	*1992*	*1991*	*1990*
Íløgustudningur	2,1	1,6	3,2	3,5	4,6
Rentustudningur	1,5	2,0	1,0	1,0	2,2
Til grunnin	3,6	3,6	4,2	4,5	6,8
- Neytahald (mjólkastudningur)	9,0	9,3	12,0	12,5	13,0
- Kjøt	1,5	2,5	2,5	2,8	2,8
- Stráfóður	1,2	2,0	1,1	1,3	0,7
- Nýdyrkun v.m.	2,2	3,0	2,7	2,5	2,2
Húsdjórvaling	0,0	0,0	0,2	0,2	0,3
- Súrhoyggjabrunnar	0,5	0,5	0,3	0,3	0,3
Studningur fult	18,0	20,9	23,0	24,1	26,1

Viðmerkingar til íløgustudning

Íløgustudningurin verður ikki tikin við í rakstrarroknskapi Jarðargrunsins, men verður inntøkuførdur beinleiðis undir eginognini. Uppá fyrispurning um hví so er, upplýsir Jarðarráðið, at orsøkin er, at hesin studningur bert kann veitast sum lán úr grunnimum.

Viðmerkingar til rentustudning

Viðvíkjandi rentustudningi hava løgtingsgrannskoðararnir spurt um, hví renturúlreiðslur, rentustudningur og ein partur av renturinntøkunum ikki verður tikin við í rakstrarroknskapinum hjá Jarðargrunninum, men vístur í eini notu til studningskonti.

Jarðarráðið upplýsir, at rentustudningurin verður veittur til gjald av renturunni millum ta rentu, sum Føroya Jarðargrunnur skal gjalda fyri tey lán, sum grunnurin upptekur, og ta rentu, sum grunnurin fær til til íløgur á festunum.

Útlánsrentan hjá Føroya Jarðargrunni hevur verið 3% p.a., meðan rentan av teimum lánum, sum grunnurin hevur upptikið seinastu tíðina, hevur verið um 11% p.a.

Av rentuinntøkunum av útlánum grunnsins verður ein partur, svarandi til 3% av restsaldo av lánunum sum grunnurin hevur tikið upp, mótroknaður í rentuútreiðslunum. Upplýst verður, at Føroya Jarðargrunnur hevur afturgoldið øll síni lán í 1995, og verður sostatt ikki talan um rentustudning tey fyrstu komandi árini.

Viðmerkingar til studning til mjólk, kjøt og stráfóður v.m.

Hesir studningar eins og rentustudningurin eru í roknskapinum útgreinaðir undir postinum »studningskonti«. Her sæst, hvussu nógv er játtað, hvussu nógv er útgoldið í árinum, og hvussu nógvur peningur er tøkur ella restur í við árslok viðvíkjandi teim einstøku studningsskipununum. Talan er sostatt um eitt slag av grunnum, og við árslok 1994 var játtaður ikki útgoldin stundlingur í alt uml. 2,2 mió.kr. Fyri at umsita studningarnar fær Jarðargrunnurin árliga 273 t.kr., sum verða mótroknaðar í starvsfólkaútreiðslunum og útreiðsluførdar undir teim ymsu studningsskipununum.

Studningur til mjólk, kjøt og stráfóður verður veittur eftir reglum, sum landsstýrið ásetir á hvørjum ári.

Studningur til nýlyrkju v.m., húsdjóraaling og súrhoyggjabrunnar verður veittur eftir umsókn og játtaður av Jarðarráðnum í hvørjum einstøkum føri.

Løgtingsgrannskoðararnir hava heft seg við, at studningur til avloysaraskipan fyri mjólkaframleiðarar, sum verður veittur á fíggjarlógini, als ikki sæst aftur í roknskapinum.

Jarðarráðið upplýsir, at peningurin, sum verður goldin til skipanina, verður settur á bankabók. Innistandandi pr. 31. desember, við rentum roknaðum fram til 1. mei, verður útgoldið mjólkaframleiðarunum 1. mei í mun til, hvussu nógva mjólk hvør einstakur hevur latið til eitt mjólkarvirki í tíðarskeiðinum 1. januar til 31. desember árið fyri.

Skipanin var grundað á hesa inngjalding:

framleiðarin	kr. 0,05/ltr.
mjólkarvirkið	kr. 0,05/ltr.
játtan á fíggjarlóg	kr. 0,10/ltr. *

*) Av tí at játtanin yvir fíggjarlógina er minkað, svarar hesin parturin nú til umb. 7,5 øru/ltr.

6. *Roknskapargrannskoðanin/viðmerkingar:*

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið ársroknskapirnar og grannskoðanarprotokollirnar til tess at vissa seg um, at rætt er farið fram bókhaldsligt og roknskaparliga.

7. *Aðrar viðmerkingar:*

Uppá fyrispurning um, hvussu Jarðarráðið annars tryggjar, at jørðin verður umsitin best møguligt, vísir Jarðarráðið á grein 3 í kunngerð nr. 122 frá 21. juli 1992 um festir, har ásett er, at festarin hevur skyldu at framleiða á festinum mest møguligt, sæð í mun til marknaðarviðurskiftini, og hvat annars má haldast at vera fíggjarliga ráðligt. Um festari heldur sínar gjaldsskyldur yvirfyri Jarðargrunninum, verður í fyrsta lagi metti, at jørðin verður umsitin. Mett verður, at møguleikin at áleggja festarum stórri framleiðslu á gerðum teirra ikki er tilstaðar sum er, orsakað av nógv versnandi marknaðarviðurskiftunum, serlipa minkandi keypiorku og kvotuásetingunum fyri mjólk.

Í sambandi við viðgerðina av fíggjarlógini fyri 1993 samtykti løgtingið uppskot frá meirihlutanum í fíggjarnevndini um at áleggja landsstýrinum skjótast gjørligt at fremja broytingar í lóggávu og kunngerðum fyri at umskipa studulsveitingina til mjólkarframleiðarar. Vist varð á, at studningurin hjá fiskivinnuni varð um-

lagdur frá kilostudningi til fløgustudning, og at sama skipan átti at verða galdandi viðvíkjandi studningitum til mjólkarframleiðarar. Eisini varð víst á møguleikan at strika fjóslán, uppdyrkingarlán og rakstrarlán.

Av viðmerkingum landsstýrisins til fíggjarlógaruppskot fyri 1994 gongur fram, at landsstýrið hevur arbeitt við hesum máli, men at onki uppskot um broytingar fyriliggur.

Løgtingsgrannskoðararnir hava spurt landsstýrið um, hvat síðani er hent í hesum máli.

Landsstýrið upplýsir, at ein nevnd er sett at gera broytingar í verandi landbúnaðarlógum, harundir eisini studningsskipanum, og at nevndin miðar ímóti at verða liðug við arbeiðið um ársskiftið 1996/1997.

Vísandi til løgtingsmál nr. 191/1993 legði landsstýrið í mars 1994 uppskot fyri tingið um broyting í lóg »om jordbrugets fremme« m.a. við tí endamáli at heimilað Jarðargrunninum at umleggja og niðurskriva verandi lán úr grunninum. Uppskotið er síðani burturdottið.

- - - - -

Vísandi til tær 110-120 mió.kr., sum veittar eru í studningi úr landskassanum seinastu 5 árini, hava løgtingsgrannskoðararnir biðið landsstýrið um eina nærri lýsing av endamálinum við teimum ymsu studningsskipanum, og eina meting av, í hvønn mun hesi eru rokkin.

Tað sum landsstýrið kann upplýsa í hesum spurningi er, at ongin formaliserað orðing av endamálinum fyri studningunum finst, og er hetta orsakað av vantandi landbúnaðarpolitikki. Víst verður á, at hesin spurningur verður eisini loystur í omanfyrinevndu landbúnaðarnevnd.

- - - - -

Løgtingsgrannskoðararnir mæla enn einaferð til at lógararbeiðið viðvíkjandi landsjørðini verður gjørt liðugt, soleiðis at restin av ríkislógini og reglugerðini frá 1937 verður tillagað nútíðar viðurskiftum. Her er m.a. talan um fleiri lógarásettar reglur viðvíkjandi fíggjarviðurskiftum, sum eru óútfarbóskandi, og sum ikki verða fylgdar.

Løgtingsgrannskoðararnir meta, at roknskapurin hjá Jarðargrunninum sum heild tykist nakað ógreiður, og bæði roknskapargrannskoðanin og fyrisiting taka undir við, at roknskaparreglurnar eiga at verða dagførdar.

1. viðgerð 17. januar 1996. Málið varð beint beinleiðis til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 22. januar 1996. Uppskotið endaligt samtykt við 27-1-0 atkvøðun.

4 Grannskoðan av almennum roknskapum.
6 Roknskapir hjá Vakstrarhúsgrunninum fyri árini 1993 og 1994

Ár 1995, hósdagin 21. desember legði Atli Hansen vegna løgtingsgrannskoðararnar fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Løgtinglø samtykkir at góðkenna roknskapirnar hjá Vakstrarhúsgrunninum fyri fíggjarárini 1993 og 1994.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

1. Endamál:

Vakstrarhúsgrunnurin er ikki stovnssettur við lóg, men landsstýrið gjørdi í november 1985 eina interna reglugerð fyri grunnin. Grunnurin verður fyrisitin av Føroya Jarðarráð, og hevur til endamáls at veita lán og studning til vakstrarhús og grønmetisframleiðslu.

- - - - -

Til tess at kunna løgtingið um ta fíggjarligu gongdina, er gjørdur ein samandráttur av ársrokn skapunum fyri 1990-1994:

2. Yvirlit yvir rakstur 1990-1994:

	1994	1993	1992	1991	(t.kr.) 1990
Studningur v.m.	0	0	400	800	800
Sakargjald	0	1	0	2	0
Rentur av útlánum	86	231	151	131	124
Rentur av peningi v.m.	3	49	68	50	34
Inntøkur falt	**89**	**281**	**619**	**983**	**958**
Útgoldin studningur	0	0	0	÷5	÷7
Umsiting	÷20	÷20	÷40	÷30	÷30
Avskrivingar av lánum	0	÷209	÷3,000	0	0
Ársúrslit	69	52	÷2,401	948	921

Játtanin til grunnin á fíggjarlógini fyri 1993 og 1994 var 0 kr., og grunnurin hevur hvørki veitt lán ella studning í árunum. Avskriving av lánum uppá 3,2 mió.kr. er larin fram í 1993, men 3 mió.kr. vórðu longu avsettar til tap í 1992.

3. Yvirlit yvir gongd í fíggjarstøðuni 1990-1994:

	1994	1993	1992	1991	(t.kr.) 1990
Ogn:					
Útlán og eftirstøður	1.228	1.277	1.164	4.034	3.964
Tøkur peningur	3.679	3.561	3.685	3.195	2.287
Ogn í alt	4.906	4.837	4.849	7.229	6.251
Eginpeningur og skuld:					
Eginpeningur	4.906	4.837	4.786	7.186	6.238
Millumrokning Jarðargrunnin	0	0	63	43	13
Eginpeningur og skuld í alt	4.906	4.837	4.849	7.229	6.251

4. Roknskapargrannskoðanin:

Av grannskoðanarátekningini á roknskapin fyri 1994 gongur fram, at roknskapargrannskoðarin er samdur við ráðið um, at tað ivaleyst verður truplari í framtíðini at fáa rentur og avdráttir inn, og at tað tí er ein spurningur, um avseting átti at verið gjørd fríti tapi upp á áogn.

5. Viðmerkingar:

Spurningurin um endurskoðan av reglugerðini ella avtøku av grunninum er áður reistur í ollum løgtingsgrannskoðaranna. Landsstýrið upplýsti í november í 1993, at Jarðarráðið mælir til, at grunnurin verður varðveittur, soleiðis at Jarðarráðið varðveitir heimildina at sundla/fíggja vakstrar- og grønmetisvinnu, sum Jarðargrunnurin ikki heimilar, og at landsstýrið tí fer at biðja á Jarðarráðið um at gera uppskot til endurskoðan av reglunum fyri Vakstrarhúsgrunnin.

Løgtingsgrannskoðararnir hava hefi seg við, at fleiri lán vórðu veitt úr Jarðargrunninum til vakstrarhús, áðrenn vakstrarhúsgrunnurin varð «stovnsettur».

Løgtingsgrannskoðararnir hava áður átalað, at tøki peningur grunsins verður ov lágt rentaður. Í hesum sambandi vísir Jarðarráðið á, at sambert lóg nr. 48 frá 28. apríl 1992, grein 4, um innlán í Landsbankan, varð tøki peningur grunsins flittur á konto í Landsbankanum 28. apríl 1994.

Í seinasta áliti løgtingsgrannskoðaranna, dagfest 22. februar 1994 viðvíkjandi roknskapinum fyri 1992, varð mælt landsstýrinum til at umhugsa spurningin um avtøku av grunninum av nýggjum, vísandi til at landsstýrið á flest øllum økjum hevur avtikið grunnar við tí fyri eyga at geva politisku myndugleikunum ein møguleika at gera sær eina mynd av nýtsluni í einum fíggjarári.

Um landsstýrið ætlar at varðveita grunnin, verður tí mælt til at leggja lógaruppskot fyri tingið um hetta, eisini vísandi til at einasta grundarlag fyri virkseminum er ein heldur ófullfíggjað intern reglugerð frá landsstýrinum.

1. viðgerð 17. januar 1996. Málið verð beint beintrielis til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 22. januar 1996. Uppskotið varð endaliga samykt við 26-1-0 atkvøðum.

4 Grannskoðan av almennum roknskapum.
7 Roknskapir hjá Føroya Ídnaðargrunni fyri árini 1993 og 1994

Ár 1995, høsdagin 21. desember legði Atli Hansen vegna løgtingsgrannskoðararnar fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapirnar hjá Føroya Ídnaðargrunni fyri fíggjarárini 1993 og 1994 við niðanfyristandandi viðmerkingum.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

1. Lógargrundarlag:

Føroya Ídnaðargrunnur varð settur á stovn við løgtingslóg nr. 68 frá 24. september 1970. Viðtøkurnar fyri grunnin vórðu ásettar av landsstýrinum við kunngerð nr. 7 frá 28. apríl 1971.

2. Endamál:

Endamálið við grunninum er at veita lán til fløgur í ídnaðar- og handilsfyritøkur við tí í hyggju at stuðla umskipan til broytt marknaðarviðurskifti.

Av viðmerkingunum sæst, at orsøkin upprinnaliga var handilsligu viðurskifti Føroya við EFTA.

Ásettar eru fleiri reglur, ið hava til endamáls at tryggja, at ansað verður eftir, at tapini verða so lítil sum gjørligt.

T.d. verður ásett í § 7: «at lánið ikki má vera hægri enn neiðtigt og neyðugt er eftir eini meting av møguleikunum hjá virkinum at bera seg upp lívfæri tess», og í § 11 í kunngerðini verður ásett, at virkir, sum fáa lán, koma undir «roknskaparligt og tekniskt eftirlit».

Lógin, reglugerðin og viðmerkingarnar leggja soleiðis upp til ein varnan og tryggan útlánspolitikk, soleiðis at vandin fyri tapi av høvuðsstólinum verður so lítil sum gjørligt.

3. *Fíggjarviðurskifti:*

Grunnurin fekk upprunaliga eitt stovnsfæ uppá 4,5 mió.kr. og heimild at taka lán upp til 20 mió.kr. Landsstýrið hevur við kunngerðum hækkað hetta loft stigvíst til 300 mió.kr., til loftið varð avtikið í 1989, sama ár sum ein lóg varð samtykt ið heimilaði landsstýrinum at veðhalda upp til 40 mió.kr.

Burtursæð frá stovnsfænum hevur grunnurin ikki beinleiðis fingið játtað pening á fíggjarlógini fyrr enn í 1993 og í 1994.

Grunnurin hevur fingið »almenn« lán úr:
- Fløgugrunni Ídnaðarins
- Fleggingargrunninum fyri Føroyar
- Oljugrunninum.

Restskuldin av láninum úr oljugrunninum uppá 15 mió.kr. varð strikað í 1993. Ultimo 1994 varð lánið úr fleggingargrunninum 78 mió.kr. og úr fløgugrunninum 16 mió.kr.

Harumframt hevur grunnurin uttanlandslán uppá umr. 51 mió.kr., sum landskassin veðheldur fyri.

4. *Yvirlit yvir rakstur 1990-1994:*

Til tess at kunna løgtingið um gongdina í útreiðslunum, er gjørdur ein samandráttur úr roknskapunum fyri árini 1993-1994 og til sammetingar eru roknskapartøl fyri árini 1990-1992 tikin við:

	1994	1993	1992	1991	1990
Rentuinntøkur	9	19	26	29	29
Útreiðslur:					
Rentuútreiðslur	14	17	19	19	20
Aðrar útreiðslur	2	5	2	2	2
Tap og avset. uppá skuldarar	5	33	45	25	24
	÷21	÷55	÷66	÷47	÷46
Ársúrslit	÷12	÷36	÷40	÷18	÷17
Stuðul úr landskassanum	45	30	-	-	-
Úrslit aftaná stuðul	33	÷6	÷40	÷18	÷17

5. *Yvirlit yvir gongd í fíggjarstøðuni 1990-1994:*

	1994	1993	1992	1991	1990
Aktiv:					
Útlán	93	142	183	222	237
Avsett móti tapi	÷40	÷70	÷64	÷40	÷23
	53	72	119	182	214
Virðisbrøv í landsbankanum	19	-	-		-
Donsk virðisbrøv	25	-	-		-
Tøkur peningur	43	59	58	53	34
Yvirtiknar ognir	5	16	11	7	4
Skrivstovurbygningur	6	7	11	11	12
Aktiv samanlagt	151	154	199	253	264

Passiv:					
Lán	147	183	224	236	229
Eginogn	4	÷29	÷24	17	36
Passiv samanlagt	151	154	199	253	264

6. *Seinasta áliit løgtingsgrannskoðaranna:*

Í seinasta áliti løgtingsgrannskoðaranna dagfest 9. apríl 1994 viðvíkjandi roknskapinum hjá Føroya Ídnaðargrunni fyri árið 1992 varð mint á, at samstundis sum løgtingið í juni 1993 samtykti lóg um eftirgeving av skuld og endurstovnan av eginpeningi Føroya Ídnaðargrunns, samtykti løgtingið uppskot til samtyktar um at heita á landsstýrið um at taka spurningin um sammanlegging av Føroya Ídnaðargrunni, Menningargrunni Ídnaðarins og møguliga Grunninum til Ídnaðarfrembjandi Endamál og Gistingarhúsgrunninum til viðgerðar.

Umsitingin í landsstýrinum metir, at Menningar- og Ídnaðargrunnurin, sum er, ongan møguleika hava fyri at virka uttan eina nýnandi kapitalveiting, og at alt gjaldførið í grunnunum er bundið at gjalda avdráttir av lánum. Umsitingin metir ikki, at grunnarnir skulu endurreisast, men at nýggju studuls- og lániskipanirnar, so sum Framtaksgrunnur, Ábyrgdargrunnur, studul til nýggjar vinnur v.m. umfram aðrar verandi studulsskipanir, framyvir skulu nøkta tann tarv, vinnulívið hevur fyri studli. Men umsitingin metir at ein fordeling fyri, at avtaka grunnarnar er, at grunnarnir hava møguleikar fyri at gera akkordir, meðan ivi er um landsstýrisins møguleikar at gera tað sama.

- - - - -

Vegna tiggjarligu støðuna hevur Ídnaðargrunnurin so at siga ongki útlánsvirksemi havt seinastu árini, og í seinasta áliti varð heitt á landsstýrið um at gera eina meting av, í hvønn mun tað er skilagott at grunnurin uppsamlar stórt gjaldføri í peningastovnum við kapitalinnskoti og eftirgeving av skuld úr landskassanum og avdráttarskúa, m.a. vísandi til, at rentumarginalur grunsins gerst minni og minni.

Landsstýrið upplýsir, at likviditetsstøðan í samfelagnum hevur verið trong, og at tað varð hildið rettast, at hesin peningur var innistandandi í føroyskum peningastovnum, og nú likviditetsstøðan er ein onnur, verður arbeitt við at nýta henda pening til at afturgjalda lán.

7. *Roknskapargrannskoðanin:*

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið ársroknskapirnar og grannskoðanarprotokollirnar til tess at vissa seg um, at rætt er farið fram bókhaldsliga og roknskaparliga hjá grunninum.

Í grannskoðanarátekningini verður mett, at bóast fey stóru tapini og tær stóru avsetingarnar, kann tað ikki útihýsast, at búskaparliga gongdin í Føroyum kemur at hava við sær, at neyðugt verður við enn størri avsetingum, og at tann fallandi inntjeningin hjá grunninum kann føra við sær tørv á nýggjum peningi.

Í grannskoðanarprotokollini fyri 1993 og 1994 ger roknskapargrannskoðanin vart við, at stýrið í ávísum førum er farið út um heimildina í § 13 í viðtøkunum, har ásett er, at stýrið kann minka um ella óiseta afturgjalding av avdrátti uppá útlán upp til 2 ár, og heitt verður á stýrið um at fáa hesi viðurskifti í rettlag. Víst verður í hesum sambandi á, at bóast nevnda grein er tann einasta í viðtøkunum, sum gevur stýrinum nakra heimild til at víkja frá teirri avtalaðu afturgjaldstíðini, eru lán umløgd/niðurfryst, og Ídnaðargrunnurin hevur í fleiri førum strikað restskuldina fróti einum kontantum inngjaldi. Mett verður tó, at vórðu tílíkar avtalur ikki gjørdar, fekk Ídnaðargrunnurin eitt enn størri tap uppá láninir.

Í hesum sambandi førir leiðslan í grunninum fram, at er skuldarin ikki førur fyri at rinda og grunnurin ikki longur, sum virðini eru fallin, hevur nóg gott pant fyri láninum, fer grunnurin ikki nakað hurtur úr, at pantið verður selt á tvingsilssølu ella skuldarin fer konkurs. Verður tað eftir eini kvalifiseraðari meting mett, at tað kann vera ein fyrimunur fyri grunnin til dømis at geva ein avdráttarskúa eina tíð, at gera eina afturgjaldingarskipan ella at virkið fær útveguð ligging til eina akkordskipan, sum kann geva grunninum eina kontanta upphædd móti at strika restskuldina, hevur grunnurin hæði rætt og skyldu til at gera hetta. Víst verður á, at grunnurin ikki strikar skuld við fyriliti til skuldaran, og verður skuld í tílíkum føri bert strikað aftaná tvings-

ilssøtu ella konkursviðgerð. Í skrivi dagfest 24. februar 1995 hevur grunnurin heitt á landsstýrið um at strika umrøddu § 13 í kunngerð nr. 7 frá 28. apríl 1971.

8. *Viðmerkingar:*

Løgtingsgrannskoðararnir hava helt seg við, at roknskapargrannskoðarin ger vart við, at Ídnaðargrunnurin onga heimild hevur til at gera akkordir, samstundis sum landsstýrið í øðrum sambandi vísir á, at ein forðing fyri at avtaka grunnin er, at hesin kann gera akkordir.

Mælt verður til at hesi viðurskifti verða avklárað.

Ídnaðargrunnurin hevur onki útlánsvirksemi havt seinastu árini, renturnarginalurin er negativur og roknast má við, at grunnurin komandi árini við óbroyttum/ongum virksemi kemur at geva halli.

Í skrivi frá Føroya Ídnaðargrunni dagfest 12. oktober 1995 til landsstýrið verður m.a. gjørt vart við, at Føroya Ídnaðargrunnur kann koma at tørva 5-10 miló.kr. komandi fíggjarár fyri at vera solventur við árslok 1996, alt eftir hvussu framtíðin roynist.

Vísandi til omanfyristandandi verður mælt til, at landsstýrið tekur avgerð um, hvat ætlanin er við Ídnaðargrunninum, og leggur uppskot hesum viðvíkjandi fyri løgtingið til støðutakan.

1. viðgerð 17. januar 1996. Málið varð beint beintleiðis til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 22. januar 1996. Uppskotið endaliga samtykt við 26-1-0 atkvøðum.

4 Grannskoðan av almennum roknskapum.
8 Roknskapir hjá Menningargrunni Ídnaðarins fyri árini 1993 og 1994

Ár 1995, hósdagin 21. desember legði Atli Hansen vegna løgtingsgrannskoðararnar fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapirnar hjá Menningargrunni Ídnaðarins fyri fíggjarárini 1993-1994 við niðanfyristandandi viðmerkingum.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

1. Lógargrundarlag:

Lógargrundarlagið er LI. nr. 37 frá 26. juni 1973 um menningargrunn fyri ídnað, handverk og tænastufyrituku, við seinni broytingum.

Við heimild í § 7 í lógini hevur landsstýrið, seinast í kunngerð nr. 17 frá 31. mars 1989 um viðtøkur fyri Menningargrunn Ídnaðarins, fyrisett nærri reglur fyri virksemi grunsins.

2. Endamál:

Tað gongur fram av áliti ídnaðarnevndarinnar til upprunaliga lógaruppskotið, at ætlanin við stovnsetanini var at menna ídnað, handverk og tænastufyrituku í Føroyum við beinleiðis fíggjarligum studningi, ella við lánsveiting o.t. »har aðrir lanistovnar ongan stuðul veita«.

Lógin heimilar grunninum at veita:

- uppbyggingar-/útflutningskreditt og -veðhald
- rentustuðning
- stuðning til vørumenning og gransking v.m.
- hjálp til mennan á serligum støðum
- lán og/ella stuðning til fíggjan og rakstur av nýstovnaðum virkjum og umskipan av verandi.

Sambært viðtøkum grunsins, eigur nevndin at býta veitingar úr grunninum best møguligt millum ymiskar vinnugreinir, og harumfram at hava í huga neyva samvinnu við landsstýrið og ymsar stovnar, til tess at samskipa heildarveitingarnar best møguligt. Viðtøkurnar áseta ávís hámørk fyri tær einstøku veitingarnar í mun til (fløgu)útreiðslurnar, og at øll lán uppá meira enn 2 mió.kr. og veðhald størri enn 3 mió.kr. krevja góðkenning frá landsstýrinum. Somuleiðis krevur stuðningsveiting uppá meira enn 500 t.kr. og fløgustuðningur uppá meira enn 400 t.kr. góðkenning frá landsstýrinum. Í viðtøkunum eru áseettar ávísar reglur um m.a. at fløgulán ikki mugu fara uppum 90% av fløgutreiðslunum.

3. *Fíggjarviðurskifti:*

Sambæri § 2 í viðtøkunum, er fíggjarliga støðið undir grunninum:

a) játtan á fíggjarlógini,
b) lántøka við landskassaveðhaldi,
c) rentuinntøkur,
d) endurgoldin givin lán,
e) 1°/00 gjaldið sambæri lógarinnar § 4,
f) aðrar inntøkur.

4. *Yvirlit yvir rakstur 1991-1994:*

Inntøkur:	1994	1993	1992	1991
Stuðningur úr landskassanum	5	0	12	15
Rentuinntøkur	10	15	23	36
	15	15	35	51
Útreiðslur:				
Rakstrarútreiðslur	2	2	4	5
Stuðningur	0	0	0	÷1
Rentuútreiðslur	13	20	21	25
Burturleggingar og avskrivingar av lánum	÷2	÷5	91	165
Avskrivingar av bygningi	1	1	17	1
Húsaútreiðslur viðv. 1986-92	0	3	-	-
	14	21	128	195
Úrslit	1	÷6	÷93	÷144
Eykajáttan	0	65	63	-
	1	+59	÷30	÷144

5. *Yvirlit yvir gongd í fíggjarstøðuni 1991-1994:*

Aktiv	1994	1993	1992	1991
Útlán	39	66	114	251
Avsett móti tapi	÷26	÷47	÷79	÷111
	13	19	35	140

Virðisbrøv í landsbankanum	14	-	-	
Innistandandi í peningastovnum v.m.	95	149	92	54
Skrivstovubygningur	7	8	9	20
Aðrir bygningar	-	-	-	9
Skuldarar v.m.	-	1	-	-
Aktiv samanlagt	129	177	136	223

Passiv

Skuld:				
Uttanlandslán	118	166	176	194
Íløgugrunnurin	0	0	0	25
Oljugrunnurin	0	0	0	17
Íleggingargrunnurin fyri Føroyar	2	2	2	3
Onnur lán v.m.	0	0	10	11
	120	168	188	250
Eginogn. íroknað kursman v.m.	9	9	+52	+27
Passiv samanlagt	129	177	136	223

6. *Seinasta álit løgtingsgrannskoðaranna:*

Í seinasta áliti frá løgtingsgrannskoðarunum dagfest 9. apríl 1994 viðvíkjandi ársroknskapinum fyri 1992 varð mint á, at tá løgtingið í juni 1993 samtykti lógaruppskot landsstýrisins um endurstovnan av eginpeningi Menningargrunni Ídnaðarins við 65 mió.kr., samtykti løgtingið samstundis uppskot til samtyktar um at heita á landsstýrið um at taka spurningin um samanlegging av Føroya Ídnaðargrunni, Menningargrunni Ídnaðarins og møguliga Grunninum til Ídnaðarfremjandi Endamál og Gistingarhúsgrunninum til viðgerðar.

Umsitingin í landsstýrinum metir, at Menningar- og Ídnaðargrunnurin, sum er, ongan møguleika hava fyri at virka uttan eina munandi kapitalveiting, og at alt gjaldførið í grunnunum er bundið at gjalda avdráttir av lánum. Umsitingin metir ikki, at grunnarnir skulu endurreisast, men at nýggju stuðuls- og lániskipanirnar, so sum Framtaksgrunnur, Ábyrgdargrunnur, stuðul til nýggja vinnu v.m. umframt aðrar verandi stuðulsskipanir, framyvir skulu nøkta tann tørv, vinnulívið hevur fyri stuðli. Men umsitingin metir at ein forðing fyri, at avtaka grunnarnar er, at grunnarnir hava møguleikar fyri at gera akkordir, meðan ivi er um landsstýrisins møguleikar at gera tað sama.

- - - - -

Vegna fíggjarligu støðuna hevur Menningargrunnurin onki útlánsvirksemi havt seinastu árini, og í seinasta áliti varð heitt á landsstýrið um at gera eina meting av, í hvønn mun tað er skilagott at grunnurin hevði umf. 150 mió.kr. innistandandi í peningastovnum við lítlum ella negativum rentumarginali, og hví hesin peningur ikki heilt ella partvíst varð nýttur til at afturgjalda lán.

Landsstýrið upplýsir, at likviditetsstøðan í samfelagnum hevur verið trong, og at tað varð hildið rættast, at hesin peningar var innistandandi í føroyskum peningastovnum, og nú likviditetsstøðan er ein onnur, verður arbeitt við at nýta henda pening til at afturgjalda lán.

- - - - -

6. apríl 1992 samtykti løgtingið uppskot til samtyktar frá løgtingsgrannskoðarunum dagfest 26. februar 1992 í sambandi við at ársroknskapirnir fyri Menningargrunn Ídnaðarins fyri 1985-1991 vórðu lagdir fyri tingið til góðkenningar. Í hesum áliti varð gjørt vart við ávís átaluverd viðurskifti v.m., og í seinasta áliti vístu løgtingsgrannskoðararnir á, at teir síðani fleiri ferðir uttan úrslit hava heitt á landsstýrið um at geva løgtingsgrannskoðarunum eina skrivliga frágreiðing viðvíkjandi teim viðurskiftum, sum onnødd vórðu í álitinum:

Víst varð m.a. á, at grunnurin í tíðarskeiðinum 1986-1991 hevði mist umleið 225 mió.kr. (165 mió.kr. í 1991) sum tap uppá skuldarar. Løgtingsgrannskoðararnir mettu, at fleiri avskrivingar og avsetingar áttu at verið gjørdar áðrenn 1990, um so var, at sami metingar- og roknskaparháttur sum í 1991 varð nýttur.

Samanumtikið høvdu løgtingsgrannskoðararnir hesar viðmerkingar:

1. Í § 4 í lógini er ásett, at ein av fíggingarkeldum grunsins skuldi vera eitt gjald uppá 1"/00 av árliga umsetninginum hjá øllum ídnaðarvirkjum, handverkara- og tænastufyritøkum. Av praktiskum grundum hevur landsstýrið mett, at gjaldið ikki skuldi innkrevjast.

   Lógin og reglugerðin er tó ongantíð broytt hesum viðvíkjandi.

   Løgtingsgrannskoðararnir átalaðu, at hetta ikki var gjørt, og mæltu til, at álagt verður landsstýrinum at kanna hesi viðurskifti aftur.

2. Løgtingsgrannskoðararnir átalaðu, at mannagongdin í sambandi við viðgerð av umsóknum, innanvirkis eftirlit, debitorrøkt, risikometing v.m. ikki hevði verið nóg væl skipað.

3. Løgtingsgrannskoðararnir heittu á landsstýrið um at geva eina frágreiðing um, hvussu keyp, umbygging og fígging av bygninginum – uppá falt uml. 60 mió.kr. – har grunnurin eigur 1/3, er farin fram. Parturin hjá Menningargrunninum er í 1992 niðurskrivaður við uml. 12 mió.kr.

4. Løgtingsgrannskoðararnir mettu, at punkt 8.1 og 8.2. í kunngerðini, har ásett er at býta veitingarnar best møguligt ímillum ymsar vinnugreinir í neyvari samvinnu við landsstýrið, ikki hevði virkað nóg væl, m.a. við tað at avgerðargrundarlagið ikki hevur verið nóg gott.

5. Løgtingsgrannskoðararnir mettu, at virksemið hjá Menningargrunninum og samvinnan við Føroya Ídnaðargrunn, Búskaparráðið, Menningarstovuna og landsstýrið til tess at tryggja ein skynsaman og samskipaðan stuðuls- og útlánspolitikk til frama fyri menning og umskiping av ídnaði, handverks- og tænastufyritøkum ikki hevði verið nóg væl skipað øll árini.

6. Løgtingsgrannskoðararnir mæltu til, at lóg/viðtøkur verða broyttar, so at nærri krøv til viðgerð av umsóknum, innanvirkis eftirlit, debitorrøkt, risikometing v.m. verða ásett.

7. Løgtingsgrannskoðararnir mæltu landsstýrinum til at áseta nærri krøv til uppsetan av roknskapi v.m. fyri tílíkar stovnar/grunnar.

Løgtingsgrannskoðararnir hava síðani uttan úrslit aftur sent landsstýrinum áminningarskriv, har heitt er á landsstýrið um at svara fyrispurningum/gera viðmerkingar til umrøddu viðurskifti, og við skrivi dagfest 28. desember 1994 varð heitt á skrivstovustjóran um at upplýsa, hvør hevur ábyrgdina av, at hesir fyrispurningar verða svaraðir, og hvat orsøkin er til, at hetta ikki verður gjørt, - 14. juli 1995 og 18. oktober 1995 vórðu rykkjaraskriv eisini send til skrivstovustjóran, sum í skrivi dagfest 20. oktober 1995 vísir til Fiskivinnudeildina, uttan tó at upplýsa um orsøkina til, at omanfyri umrøddu fyrispurningar ikki verða svaraðir.

Løgtingsgrannskoðararnir hava síðani fleiri ferðir biðið Fiskivinnudeildina um eitt svar viðvíkjandi omanfyri umrøddu viðurskiftum, men enn er onki svar komið.

7. *Roknskapargrannskoðanin:*

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið ársroknskapirnar og grannskoðanarprotokollirnar til tess at vissa seg um, at rætt er farið fram bókhaldsliga og roknskaparliga hjá stovninum.

8. *Viðmerkingar:*

Vísandi til omanfyristandandi verður átalað, at landsstýrið ikki svarar fyrispurningum frá løgtingsgrannskoðarunum.

Av aktivum grunsins uppá 129 mió.kr. eru úflánini, sum áttu at verið høvuðsaktiv grunsins, einans 13 mió.kr., svarandi til 10%. Løgtingsgrannskoðararnir hava biðið Menningargrunnin um eina framskriving av inntøkum og útreiðslum grunsins komandi árini.

Ein rakstrar- og gjaldførisætlan fram til ár 2005, sum er ein framskriving av inntøkum og útreiðslum grunsins komandi árini við óbroyttum/ongum útlánsvirksemi vísir, at rakstrarútreiðslurnar, húsaútreiðslurnar og tann negativi rentumarginalurin føra við sær, at grunnurin komandi árini fær eitt árligt hall uppá umr. 4-5 mió.kr., eginognin gerst negativ í 1997 og grunnurin fær í tíðarskeiðinum ein samlaðan stuðulsmørv úr landskassanum uppá 36,5 mió.kr.

Vísandi til omanfyristandandi meta løgtingsgranskoðararnir, at talan er um ein sera dýran máta at «avviklaø» grunnin, um so er at hetta er ætlanin, og mælt verður til, at landsstýrið tekur avgerð um, hvat ætlanin er við Menningargrunninum, og leggur uppskot hesum viðvíkjandi fyri løgtingið til støðutakan.

1. viðgerð 17. januar 1996. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 22. januar 1996. Uppskotið endaliga samtykt við 25-1-1 atkvøðum.

4 Grannskoðan av almennum roknskapum
9 Roknskapir hjá Strandferðsluni fyri árini 1993 og 1994

Ár 1996, mánudagin 30. januar legði Arli Hansen vegna løgtingsgrannskoðararnar fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapin hjá Strandferðsluni fyri fíggjarárini 1993 og 1994 við niðanfyristandandi viðmerkingum.

Frágreiðing frá løgtingsgrannskoðarunum:

1. Endamál:

Nýggj reglugerð fyri Strandferðslupa varð samtykt á landsstýrisfundi 14. november 1992. Samstundis samtykti landsstýrið at avtaka reglugerðina fyri Strandferðaraskipan Landsins, lýst við kunngerð nr. 81 frá 22. august 1984. Samtbert §§ 1 og 2 í nýggju reglugerðini er Strandferðslan ein landsfyrituka undir Føroya Landsstýri, sum hevur til endamáls:

1. at vera tænastuveitandi fyrituka, við tí fyri eyga at lúka landsins førv á innlendis fólka- og farmaflutningi,
2. í so stóran mun sum gjørligt, at verða rikin út frá handilsligum sjónarmiðum.

Samtbert § 5 kann virksemið, ella partur av hesum, verða skipað í partafeløg, og verður stjórin ta stjóri ella formaður í hesum partafeløgum. Stjórin leggur uppskot um stovnan av slíkum feløgum fyri landsstýrið.

2. Fíggjarviðurskifti:

Samtbert § 4, 2. stk., í reglugerðini verður taksfpolitikkur, útbyggingar-, fíggjar-, rakstrar-, lerða- og fleguætlan skipað í 4 árs ætlanum, sum á hvørjum ári verða endurskoðaðar og lagdar fyri landsstýrið til góðkenningar í seinasta lagi 1. apríl.

3. Starvsfólkaviðurskifti

Sambært § 3 í reglugerðini setir landsstýrið stjórran, og eftir tilmæli frá stjóranum, allar leiðarar á 1. stigi. Stjórin setur annað starvsfólk sambært galdandi reglum.

- - - - -

Til tess at kunna løgtingið um ta fíggjarligu gongdina hjá Strandferðsluni er gjørdur ein samandrátur av ársroknskapunum fyri árini 1990-1994:

4. Yvirlit yvir rakstur 1990-1994:

(mill.kr.)

	1994	1993	1992	1991	1990
Inntøkur:					
Farmagjald	20	15	17	15	16
Persónsflutningur	37	38	40	39	39
Eykatúrar (incl. tyrlur)	2	6	4	9	4
Kiosk & Kafeteria	7	7	7	5	3
Bygdaleiðir	15	14	-	-	-
Inntøkur samanlagt	81	80	68	68	62
Útreiðslur:					
Hýrur	32	35	46	42	46
Olja	12	13	12	12	16
Umsiting og eykalutir	17	14	20	22	20
Tryggingar	4	4	4	4	4
Havnagjald	4	4	4	4	4
Sáttmálaútreiðslur v.m. - Bygdaleiðir	25	28	-	-	
Samferðslustovan	-	2	-	-	-
Aðrar rakstrarútreiðslur	10	8	13	15	12
Rakstrarútreiðslur samanlagt	104	108	99	99	102
Skrivstovulønir	9	10	10	9	9
Aðrar fyrisitingarútreiðslur	16	13	11	7	7
Rentuútreiðslur, netto	1	-	2	3	2
Avskrivingar, rakstrarmunur	1	1	3	3	5
Tap, skuldarar	÷1	1	4	2	-
Útreiðslur samanlagt	130	133	129	123	125
Úrslit:	÷49	÷53	÷61	÷55	÷63
Játtan á fíggjarlóg	38	43	42	42	46
Meirnýtsla í mun til fíggjarlóg	÷11	÷10	÷19	÷13	÷17
Játtað á eykafíggjarlóg	11	7	9	8	-
Meirnýtsla	0	÷3	÷10	÷5	÷17
Játtað viðvíkjandi meirnýtslu, eldri ár:					
- Játtað á eykafíggjarlóg	10	-	-		-
- Játtað av fíggjarnevndini	-		-	33	-

Roknskapurin hjá Strandferðsluni fevnir einsini um tyrluflúgvingina fram til 1. apríl 1994, tá PAF Atlantic Airways yvirtók raksturin, og síðani 1993 er virksemið hjá Bygdaleiðum eisini við í roknskapinum.

5. *Yvirlit yvir gongd í fíggjarstøðuni 1990-1994:*

(mió.kr.)

Aktiv:	1994	1993	1992	1991	1990
Kassi, bank & Giro	3	3	1	1	1
Skuldarar	8	6	12	11	10
Eykajáttan	21	7	9	8	-
Bygningar, bilar v.m.	4	2	1	3	6
Aktiv samanlagt	36	18	23	23	17
Passiv:					
Kassakreditur	15	8	10	10	21
Landskassin/tryggingarendurgjald	2	2	6	-	-
Ognarar	19	18	14	10	6
Miðtunrokning við landskassan	÷0	÷10	÷7	3	÷10
Passiv samanlagt	36	18	23	23	17

6. *Serroknskapir fyri skip, bilar og tyrlur:*

Umfram ársroknskap fyri samlaða virksemið hjá Strandferðsluni, ger Strandferðslan á hvørjum ári serroknskapir fyri hvørt skip sær, men fyri bilarnar og tyrlurnar undir einum.

Í serroknskapunum eru inntøkurnar og rekstrarútreiðslurnar útgreinaðar á tær ymsu flutningseindirnar. Niðanfyristandandi er gjørdur ein samandráttur av serroknskapunum fyri árini 1992-1994:

(mió.kr.)

	1994			1993			1992		
	Inntøkur	Rekst.-útreiðs.	Úrslit	Inntøkur	Rekst.-útreiðs.	Úrslit	Inntøkur	Rekst.-útreiðs.	Úrslit
Smyril	18,2	23,8	÷5,6	17,3	22,0	÷4,7	12,0	20,7	÷8,7
Teistin	12,0	18,4	÷6,4	12,6	20,7	÷8,1	14,3	21,8	÷7,5
Sam	6,8	4,3	+2,5	8,8	4,7	+4,1	8,3	5,9	+2,4
Terman I	0,8	2,4	÷1,6	1,2	1,8	÷0,6	1,1	1,4	÷0,3
Fagrines	-	-	-	-	-	-	1,2	0,8	+0,4
Terman	10,0	6,3	+3,7	9,9	6,7	+3,2	11,2	8,9	+2,3
Dúgvan	5,1	6,1	÷1,0	0,8	2,8	÷2,0	3,8	6,6	÷2,8
Tróndur	2,7	5,8	÷3,1	3,7	5,3	÷1,6	4,2	6,7	÷2,5
Ritan	1,0	1,5	÷0,5	1,1	1,9	÷0,8	1,4	2,8	÷1,4
Másin	0,4	1,1	÷0,7	0,2	1,3	÷1,1	0,3	1,7	÷1,4
Pride	0,1	0,9	÷0,8	0,1	0,6	÷0,5	0,2	0,7	÷0,5
Súlan	0,2	0,4	÷0,2	0,1	0,5	÷0,4	0,2	0,5	÷0,3
Barskor	0,6	1,0	÷0,4	0,3	1,1	÷0,8	0,4	1,4	÷1,0
Sildberin	0,1	0,9	÷0,8	0,1	0,8	÷0,7	0,1	1,3	÷1,2
Skip alt	58,0	72,9	÷14,9	56,2	70,2	÷14,0	58,7	81,2	÷22,5
Bilarnir	6,6	4,7	+1,9	7,1	5,5	+1,6	5,3	7,0	÷1,7
Tyrlur	0,5	1,1	÷0,6	2,4	2,7	÷0,3	4,0	11,3	÷7,3
Ídt	65,1	78,7	÷13,6	65,7	78,4	÷12,7	68,0	99,5	÷31,5
Aðrar útreiðslur			÷26,0			÷25,3			÷29,3
Úrslit			÷39,6			÷38,0			÷60,8
Úrslit Bygdaleiðir			÷10,0			÷15,5			-
Samlað úrslit			÷49,6			÷53,5			÷60,8

7. *Seinasta álit løgtingsgrannskoðaranna:*

Í seinasta áliti løgtingsgrannskoðaranna dagfest 15. apríl 1994 viðvíkjandi roknskapinum fyri árið 1992 varð átalað, at Strandferðslan aftur í 1992 hevði brúkt nógv meira enn játtað var á fíggjarlóg/eykafíggjarlóg, og at landsstýrið enn einaferð hevði sett eina órealistiska upplæddl á fíggjarlógina.

Roknskapargrannskoðanin vísti á, at ov stórur partur av farmagjaldsinntøkunum var útistandandi við ársenda 1992, og grannskoðanin metti ikki, at innanhýsismannagongdin á ferðaseðlaøkinum var nóg trygg.

Í sambandi við góðkenning av roknskapinum fyri 1992 átalaði landsstýrið, at Strandferðslan hevði disponerað yvir tryggingarendurgjaldinum fyri tyrluna, vísandi til at tyrlan var ogn hjá landskassanum. Løgtingsgrannskoðararnir mæltu til, at landsstýrið og Strandferðslan skrivliga avtalaðu eina fasta mannagongd viðvíkjandi tryggingarendurgjaldi/umvælingum, so tað framyvir slepst undan iva um, nær rætt er atborið.

8. *Roknskapargrannskoðanin/viðmerkingar.*

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið ársroknskapin og grannskoðanarprotokollina til tess at vissa seg um, at rætt er farið fram bókhaldsliga og roknskaparliga hjá stovninum.

Í grannskoðanarátekningini á roknskapin fyri 1994 verður upplýst, at krøv uppá umb. 1,2 mió.kr., sum Strandferðslan ikki hevur góðtikið, ikki eru við í roknskapinum.

Í grannskoðanarfrágreiðingini fyri 1994, sum er dagfest 12. juni 1995, verður gjørt vart við fleiri átaluverd viðurskifti:

1. Í sambandi við ferðauppgerðir fyriliggja ikki altíð ferðafrágreiðingar, og alt ov ofta verður skeivur taksur nýttur fyri dagpening.

2. Ikki øll leigumál eru góðkend av landsstýrinum

3. Nøkur av starvsfólkunum fáa eina ávisa upphædd aftrat tí vanligu lønini, hóast ongin heimild er til slíkar viðbøtur.

4. Mannagongdin viðvíkjandi bóking av avgreiðslukonti verður mett ógvuliga tilvildarlig.

5. Vístverður á, at skuldararnir lutfalsliga eru øktir munandi meira enn farmagjaldsinntøkurnar, og heitt verður á stovnin um at ansa vel eftir, at skuldararnir liggja á einum støði, sum svarar til gjaldstreytirnar.

6. Viðvíkjandi ferðaseðlainntøkunum hjá skipunum verður vístá, at ov nógvir manglar vóru í ítskriftunum frá bussum teldum, nógvir dagar vóru mistir burturúr skipanini, og at tað tí ikki er gjørligt at stemma av inntøkurnar á henda hátt. Hóast tað er møguligt dagliga at avstemma inntøkurnar, verður hetta ikki gjørt.

7. Viðvíkjandi ferðamannadeildini verður eins og í grannskoðanarfrágreiðingini fyri 1993 vístá, at arbeiðsgongdin virkar ov tilvildarlig, og ov nógvir kassamunir koma fyri.

8. Vístverður á, at tíggju-túra kortini, sum bert verða seld umborð á ferjunum, ikki eru nummererað, og at tað so at siga onki kontroll er við hesi sølu.

9. Vístverður á, at stovnurin hevur fingið betri stýring á ávisum týdningarmiklum økjum og eina veruliga fíggjarstýring, men mett verður, at stovnurin frengir til eina organisationsskipan, sum skal syrgja fyri einum betri arbeiðs- og ábyrgdarbýti, og at neyðugt er at fáa arbeiðsgongdina í og millum tær ymsu deildirnar at virka.

Løgtingsgrannskoðararnir hava biðið leiðsluna á Strandferðsluni um viðmerkingar til omanfyri nevnda viðurskifti og spurt um, hvørji stig eru tikin at fáa hesi í rætlag.

Leiðslan upplýsir, at stovnurin hevur rættað seg eftir og er í ferð við at rætta seg eftir teimum viðmerkingum, sum roknskapargranskoðanin hevur havt.

ad. 1 Reglugerð og eftirlitsskipan er sett í verk, soleiðis at ferðauppgerðirnar eru í samsvari við almennu reglugerðirnar hjá landsstýrinum.

ad. 2 Øll leigumál eru nú góðkend av landsstýrinum.

ad. 3 Málið er sent út til lønardeild landsstýrisins, og bíður leiðslan eftir einum úrskurði haðani.

ad. 8 Nýggj skipan verður innført. Hon hevur verið royndarkoyrd umborð á tveimum av skipunum síðani august mánað og sær út til at rigga vel.

Viðvíkjandi hinum viðmerkingunum verður víst til, at Strandferðslan er í ferð við at innkoyra eina nýggja bókhaldsskipan, og í tí sambandi verða allar manglagongdir gøgnumgingnar og broyttar, har tað er neyðugt.

9. *Viðmerkingar:*

1. Løgtingsgrannskoðararnir hava heft seg við tær mongu viðmerkingar, roknskapargrannskoðanin hevur gjørt, og átala, at roknskaparumsitingin hjá Strandferðsluni á fleiri økjum ikki er nóg góð.

2. Sambært § 4, 2. stk., í reglugerðini verður takstpolitikkur, átbyggingar-, líggjar-, rakstrar-, ferða- og íløgumetlan skipað í 4 ára ætlanum, sum á hvørjum ári verða endurskoðaðar og lagdar fyri landsstýrið til góðkenningar í seinasta lagi 1. apríl.

   Uppá fyrispurning upplýsir landsstýrið, at Strandferðslan ikki hevur gjørt nakra 4 ára ætlan. Løgtingsgrannskoðararnir átala, at hesin týðandi partur av reglugerðini als ikki verður hildin.

3. Løgtingsgrannskoðararnir hava somuleiðis heft seg við, at sambært reglugerðini hevur Strandferðslan til endamáls at lúka landsins tørv á innlendis fólka- og farmaflutningi. Uttanlandssiglingin hjá Strandferðsluni er tí ikki í tráð við reglugerðina.

4. Sambært § 5 kann virksemið, ella partar av hesum, verða skipað í partafeløg, og verður stjórin tá stjóri ella formaður í hesum partafeløgum. Stjórin leggur uppskot um stovnan av slíkum feløgum fyri landsstýrið. Løgtingsgrannskoðararnir meta ikki, at tílíkar týðandi avgerðir kunnu takast av landsstýrinum, men skulu leggjast fyri løgtingið.

5. Løgtingsgrannskoðararnir hava áður vístá, at teir meta, at tað er skeivt, at Strandferðslan ger serroknskapir fyri skipini uttan at gera vart við, hvørjar meginreglur og fyritreytir eru galdandi fyri býti av inntøkum og útreiðslum, og mæla til at hetta verður gjørt framyvir. Løgtingsgrannskoðararnir meta somuleiðis, at tað er óheppi, at roknskapartølini fyri 1993 í viðmerkingunum til líggjarlógaruppskotið fyri 1996 verða útgreinað øðrvísi enn í serroknskapinum, uttan at vísa á hvørjar meginreglur og fortreytir liggja aftanfyri.

1. viðgerð 7. februar 1996. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 16. februar 1996. Uppskotið endaliga samtykt við 17 ((0 atkvøðum.

5 Tryggingarlóggávan

Ár 1995, leygardagin 30. september legði Óli Jacobsen, landsstýrismaður fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um tryggingarvirksemi

Løgtingið samtykkir viðlagda uppskot til løgtingslóg um tryggingarvirksemi (skjal A).

LØGTINGSLÓG
um
tryggingarvirksemi

Kapittul 1	§§ 1-3	Øki lógarinnar
Kapittul 2	§§ 4-12	Almennar reglur um tryggingarvirksemi
Kapittul 3	§§ 13-22	Stovnan av tryggingarfeløgum
Kapittul 4	§§ 23-24	Ognarviðurskifti
Kapittul 5	§§ 25	Fatteingisgrundartagið í tryggingarfeløgum
Kapittul 6	§§ 26-30	Sínamillum tryggingarfelóg
Kapittul 7	§§ 31-33	Limir í sínamillum tryggingarfeløgum og teirra ábyrgd fyri skyldum felagsins
Kapittul 8	§§ 34-35	Inngjalding av ábyrgdarpørtum v.m.
Kapittul 9	§§ 36-43	Leiðslan í tryggingarfeløgum
Kapittul 10	§§ 44-57	Aðalfundur í sínamillum tryggingarfeløgum
Kapittul 11	§§ 58-68	Ársroknskapur og samtøkuroknskapur
Kapittul 12	§§ 69-75	Íløgureglur
Kapittul 13	§§ 76-82	Vinningsbýti, trygdargrunnur v.m.
Kapittul 14	§§ 83-88	Umsitting av lívstryggingarmongd
Kapittul 15	§§ 89-90	Avhending av eini lívstryggingarmongd
Kapittul 16	§§ 91-91	Avhending av eini skaðatryggingarmongd
Kapittul 17	§§ 93-98	Samanlegging og klúgving
Kapittul 18	§§ 99-108	Avtøka av tryggingarfeløgum
Kapittul 19	§§ 109-122	Granskoðan og granskan
Kapittul 20	§§ 123-133	Serstakar reglur fyri sínamillum skaðatryggingarfelóg við avmarkaðum endamáli

Kapittul 21	§§ 134-138	Serstakar reglur um ávísar eftirlønargrunnar
Kapittul 22	§§ 139-141	Serstakar reglur fyri ávísar "firma"eftirlønargrunnar
Kapittul 23	§§ 142-145	Bygningsbrunatrygging
Kapittul 24	§§ 146-156	Arbeiðsskaðatrygging
Kapittul 25	§§ 157-170	Eftirlit
Kapittul 26	§§ 171-176	Endurreisingarætlanir og aðrar fyriskipanir
Kapittul 27	§§ 177-180	Ymiskar ásetingar
Kapittul 28	§§ 181-183	Revsireglur v.m.
Kapittul 29	§§ 184-185	Gildiskonu- og skiftisreglur

Kapittul 1
Øki lógarinnar

§ 1. Hendu lóg er galdandi fyri tryggingarvirksemi og virksemi hjá eftirlønargrunnum sambært kapittul 21 og 22.

Stk. 2. Fyri endurtryggingarvirksemi og samtrygging kann Føroya Landsstýri góðkenna frávik frá lógini, ella aðramátur áseta serligar reglur.

§ 2. Lógin er ikki galdandi fyri

1) arbeiðsloysisskipanir, jbr. løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing.

2) Sjúkrakassar og líknandi kassar.

§ 3. Reglurnar í hesi lóg um samtøkur verða at nýta, tá móðurfelagið er eitt tryggingarfelag.

Stk. 2. Eftirlitið kann gera av, at reglurnar um samtøkur í hesi lóg ella lógini um partafeløg eisini verða at nýta heilt ella partvíst, burtursið frá § 49, stk. 3 í partafelagslógini:

1) á bólkur av tryggingarfeløgum, ið ikki gera eina samtøku sambært § 2 í partafelagslógini, men sum tó hava eitt slíkt sínámillum samband, at nýtsla av nevndu reglum má vera mett neyðug. Hesi feløg tilnevna eitt felag, sum § 4 fevnir um, og sum er heimahoyrandi her í landinum, ið skal verða mett sum móðurfelag. Verður hetta ikki gjørt, tilnevnir Eftirlitið felagið,

2) á viðurskiftini millum eitt parta- ella smápartafelag og eitt tryggingarfelag, tá fyrst nevnda mótvegis tryggingarfelagnum hevði verið mett sum móðurfelag sambært hesi lóg, um tað rak tryggingarvirksemi.

Stk. 3. Við dótturfeløg er at skilja dótturfeløg og aðrar fyritøkur, sum felagið hevur eitt samsvarandi samband við.

Kapittul 2
Almennar reglur um tryggingarvirksemi

§ 4. Tryggingarvirksemi sambært hesi lóg kunnu einans partafeløg, sínámillum feløg og eftirlønargrunnar sambært kapittul 21 og kapittul 22 og Føroya Lívstrygging reka, sum frá Føroya Landsstýri og Eftirlitinum hava fingið loyvi (konsession) sambært § 9, stk. 1 og stk. 2.

§ 5. Eitt tryggingarfelag kann ikki hava annað virksemi enn tað tryggingarvirksemi, sum loyvið tilskilar, um ikki annað fylgir av reglunum í § 6.

Stk. 2. Eitt tryggingarfelag verður mett at reka annað virksemi, um so er, at felagið

1) fremur eina avgerandi ávirkan í einum vinnuvirki, ið rekur annað slag av virksemi enn tryggingarvirksemi ella virksemi sambært § 6, ella

2) saman við øðrum tryggingarfeløgum ella eftirlønargrunnum hevur eina avgerandi ávirkan í einum vinnuvirki, ið rekur annað virksemi enn tryggingarvirksemi ella virksemi sambært § 6, og sum ikki er eitt peningamilluntgongupartafelag.

Stk. 3. Peningamillumgongupartafeløg eru partafeløg, hvørs endamál bert er at fáa sær ognarpartar ella í aðramáta seta pening í eina ella fleiri vinnufyritøkur.

Stk. 4. Tá fleiri tryggingarfeløg gera eina samtøku, har móðurfelagið ikki er eitt tryggingarfelag, ella tey eru saman í einum fyrisitingarfelagsskapi, verða viðkomandi tryggingarfeløg mett sum eitt tryggingarfelag tá stk. 2 kemur í nýtslu. Somuleiðis verða møgulig dótturfeløg hjá einum tryggingarfelag saman við móðurfelagnum mett sum eitt tryggingarfelag.

§ 6. Umframt tryggingarvirksemi kann eitt tryggingarfelag hava fylgjandi virksemi:

1) umboð fyri tryggingarfeløg og fyri onnur feløg, ið eru undir eftirliti Eftirlitsins,

2) byggja, eiga og reka fasta ogn sum varandi peningaíløga og

3) annað virksemi, ið má metast at hoyra til felagsins tryggingarvirksemi.

Stk. 2. Eftirlitið kann gera av, at eitt virksemi, ið stk. 1, nr. 3 fevnir um, skal innast av einum øðrum felag, sum er skrásett hjá tí føroyska skrásetingarmyndugleikanum.

Stk. 3. Tryggingarfeløg kunnu gjøgnum dótturfeløg reka virksemi, sum ikki er tilskilað í loyvi felagsins, tá dótturfelagið einans rekur virksemi, ið er undir eftirliti Eftirlitsins.

§ 7. Tryggingarvirksemi og annað virksemi, ið §§ 5, stk. 1 og 6, stk. 1 fevna um, skal verða rikið samsvarandi reiðiligum handilsskikki og góðari tryggingarsiðvenju. Eftirlitið kann í førum, har virksemið verður rikið ímóti hesum geva boð um, at slíkt virksemi verður steðgað.

§ 8. Lívstryggingarvirksemi kann ikki í sama felag verða saman við øðrum tryggingarvirksemi. Tó kann sama felag hava endurtrygging av lívstrygging og aðrari trygging.

Stk. 2. Føroya Landsstýri kann áseta nærri reglur um avmarkingina millum lívstryggingarvirksemi og annað tryggingarvirksemi.

Stk. 3. Verður broyting gjørd í avmarkingini millum lívstryggingarvirksemi og annað tryggingarvirksemi, kann eitt tryggingarfelag, sum higartil hevur kunna havt samlaða virksemið í sama felag, halda áfram við hesum. Eftirlitið kann áseta nærri treytir fyri hesum.

§ 9. Eitt tryggingarfelag skal hava loyvi (konsessión) frá Føroya Landsstýri og Eftirlitinum at reka tryggingarvirksemi.

Stk. 2. Einans feløg, hvørs stovnarar kunnu skjalprógva, at parta- ella ábyrgdarpeningurin, jbr. §§ 14, stk. 1, § 25 og § 27, stk. 1 er føroyskur, kunnu fáa loyvi (konsessión).

Stk. 3. Føroya Landsstýri ásetir í kunngerð nærri reglur um próvførslu o.a. viðvíkjandi ognarviðurskiftunum í samband við tann í stk. 2 nevnda parta- ella ábyrgdarpening.

Stk. 4. Føst ogn, skip, motorakfør, lógbodnar tryggingar, lívstryggingar, eftirlønargrunnar sambært kapittul 21 og 22, og annar tryggingarbarur váði í Føroyum, ið er knýttur at føroyskum áhugamálum, kann ikki verða tryggjaður aðrastaðni, men einans í teimum í stk. 1 og 2 nevndu feløgum, tó við teimum undantøkum, sum fylgja av § 1, stk. 2.

Stk. 5. Undantikin reglunum í stk. 4 eru tryggingaráhugamál, ið hoyra undir danska rikið.

Stk. 6. Um tey í stk. 1 og 2 nevndu feløg ikki ynskja at átaka sær eina trygging, verða reglurnar í stk. 4 ikki at nýta.

Stk. 7. Áðrenn loyvi verður givið og skráseting er farin fram, kann felagið ikki tekna tryggingar. Henda regla er tó ikki til hindurs fyri, at tað, við stovnan av einum sínámillum tryggingarfelag fyri eyga, fer fram tekning av limum, um so er, at tryggingarábyrgdin ikki tekur við og tryggingargjald ikki verður kravt, áðrenn felagið er skrásett.

Stk. 8. Við fráboðan um loyvi ella broytingar í loyvi sendir Eftirlitið vegna Føroya Landsstýri og Eftirlitið samstundis avrit av loyvinum til føroyska skrásetingarmyndugleikan. Føroyski skrásetingarmyndugleikin skrásetir loyvisdagin.

Stk. 9. Eftirlitið kann afturkalla loyvi hjá einum felag, um tað ikki hevur verið nýtt í 2 ár ella meira.

§ 10. Eftirlitið kann nokta einum tryggingarfelag loyvi, um ein limur í stjórn ella nevnd tryggingarfelagsins:

1) verður mettur ikki at hava nóg góðar royndir at hava yrkið ella starvið,

2) er dømdur fyri revsiverd viðurskifti, og tað framda grundar ein nærliggjandi vanda fyri misnýtslu av yrkinum ella starvinum, ella

3) í yrkinum ella starvinum hevur havt eina slíka framferð, at orsøk er at halda, at viðkomandi ikki fer at røkja yrkið ella starvið á tryggan hátt.

Stk. 2. Loyvi kann harumfram verða noktað, um teir í kapitli 4 nevndu ognarar verða metti at vilja arbeiða ímóti einum fullgóðum rakstri av felagnum.

§ 11. Eitt tryggingarfelag kann ikki verða skrásett hjá tí føroyska skrásetingarmyndugleikanum fyrr enn Føroya Landsstýri og Eftirlitið hava givið loyvi.

§ 12. Navnið á einum tryggingarfelag skal týðiliga lýsa, at felagið er eitt tryggingarfelag. Onnur feløg v.m. kunnu ikki í teirra nøvnum ella tá tey venda sær til almenningin nýta orð, ið eru egnað til at efva ta fatan, at tey reka tryggingurvirksemi.

Stk. 2. Eitt sínámillum tryggingarfelag skal í sínum navni hava orðini "sínámillum felag", ella styttingar av hesum, ella á annan hátt týðiliga tilskila felagsins eginleika sum sínámillum felag. Reglurnar í § 153 í lóg um partafeløg verða at nýta samsvarandi.

Kapittul 3
Stovnan av tryggingarfeløgum.

§ 13. Stovningarskjalið skal umfram tað, sum er nevnt í § 5 í partafelagslógini, hava reglur um, hvønn stovnarnir hava í uppskoti til nevnd, stjórn og grannskoðarar fyri felagið.

Stk. 2. Fyri sínámillum feløg skal stovningarskjalið eisini hava tilskilan um:

1) ábyrgdina hjá limum og ábyrgdarum fyri skyldum felagsins og hvussu limir og ábyrgdarar ábyrgjast sínámillum,

2) felagið skal kunna taka við endurtrygging utan sínámillum ábyrgd, og

3) ábyrgdarpeningurin skal bera rentu, og tá sambæt hvørjum reglum.

§ 14. Partapeningurin skal inngjaldast í reiðum peningi. Eftirlitið kann tó loyva, at inngjalding hendir í øðrum virðum enn peningi (apportinnskot).

Stk. 2. Við umsóknini til Eftirlitið sambæt stk. 1, 2. pkt. skal fylgja tann í § 6 a, stk. 1 í partafelagslógini nevnda metingarfrásøgn.

Stk. 3. Stovningarskjalið skal hava upplýsing um umsóknin sambæt stk. 1, 2. pkt. er latin Eftirlitinum. Um loyvi longu er fingið frá Eftirlitinum, skal loyvið og treytirnar fyri loyvinum verða endurgivnar í stovningarskjalinum.

Stk. 4. Um Eftirlitið ikki gevur loyvi til tað apportinnskot, sum søkt er um, kann stovningarskjalið ikki verða undirskrivað. Er stovningarskjalið longu undirskrivað, tá sýting Eftirlitsins verður fráboðað, fyrir hetta við sær, at stovningarskjalið fellur burtur.

Stk. 5. Stovnandi aðalfundur kann ikki verða hildin, fyrr enn avgerð Eftirlitsins sambæt stk. 1, 2. pkt. er til skjals.

Stk. 6. Reglurnar í stk. 1-5 verða at nýta samsvarandi í samband við lívfeingishækkan.

Stk. 7. Um eitt stovningarskjal ikki hevur upplýsing sum nevnt í stk. 3, 2. pkt., verður stk. 3 at nýta samsvarandi á tekningarlistum.

§ 15. Verður felagið stovnað við tí fyri eyga at yvirtaka eina verandi tryggingarfyritøku ella yvirtaka eina tryggingarskipan frá øðrum tryggingarfelag, skal tað vera lýst í stovningarskjalinum, við tilskilan um uppskot til sáttmála um avhending av tryggingarskipanini er gjørd.

§ 16. Fær felagið ognarvirðir frá einum stovnara, ábyrgdara ella einum partueigara í forum, ið § 6 c í partafelagslógini fevnir um, skal tað góðkennast av Eftirlitinum. Tann í § 6 a í partafelagslógini nevnda metingarfrásøgn skal verða send Eftirlitinum.

§ 17. Viðtøkurnar skulu umfram tað, sum ásett er í § 4 í partafelagslógini hava reglur um tunsiting av peningi felagsins, roknskapargreiðsfu og um býtið av ársyvirskoti.

Stk. 2. Viðtøkurnar hjá sínámillum feløgum skulu eisini hava reglur um:

1) hvussu limir og ábyrgdarar bera ábyrgd fyri skyldum felagsins, og hvussu limir og ábyrgdarar ábyrgjast sínámillum,

2) felagið skal kunna yvirtaka endurtrygging utan sínámillum ábyrgd, og

3) ábyrgdarpeningurin skal bera rentu, og um so er, eftir hvørjum reglum.

§ 18. Í seinasta lagi samstundis við fráboðanina um skráseting hjá tí føroyska skrásetingarmyndugleikanum skal felagið lata inn umsókn um loyvi til Føroya Landsstýri og Eftirlitið. Við umsóknini skal fylgja stovningarskjalið og onnur skjøl, sum eru gjørd í sambond við stovningina, og skulu hesi vera frumskjøl ella avrit váttað av stýrinum, og eisini skal váttað úrskrift úr fyrstu gerðabók á stovnandi aðalfundinum fylgja við.

Stk. 2. Umsókn um loyvi skal hava eina rakstraraetlan, sum felagið hevur gjørt fyri tað virksemi, sum felagið ætlar sær at reka. Føroya Landsstýri ásetir gjøllari reglur um upplýsingar, sum skulu vera í rakstraraetlanini, og um áramál.

Stk. 3. Umsókn um loyvi skal harumfram hava upplýsingar um øll, sum beinleiðis ella óbeinleiðis eiga í mintsta lagi 10 prosent av fæfeinginum ella atkvøðuraettindunum ella ein fæfeingislut, ið gevur møguleika fyri at fremja stóra ávirkan á tryggingarfelagsins rakstur og eisini um støddina á fæfeingislutinum hjá hesum ognarum.

Stk. 4. Eitt loyvi skal hava upplýsing um tað tryggingarvirksemi, sum felagið kann inna. Føroya Landsstýri ásetir gjøllari reglur um innihaldið annars í loyvinum.

Stk. 5. Hevur Eftirlitið ikki, innan 6 mánaðir eftir móttøkuna av umsókn um loyvi, givið ummæli um umsóknina, kann felagið leggja málið fyri dómstólarnar.

§ 19. Tøkniliga grundarlagið v.m. hjá einum lívstryggingarfelag, skal fráboðast Eftirlitinum í seinasta lagi samstundis við, at grundarlagið v.m. verður tikið í nýtslu. Sama er galdandi fyri einhvørja seinari broyting í nevndu viðurskiftum. Fráboðanin skal hava tilskilan um

1) grundarlagið fyri útrokningini av tryggingargjøldunum og lívstryggingarburturleggingum,

2) teir tryggingarformar, sum felagið ætlar at nýta,

3) reglur fyri útrokning og býti av yvirskoti til tryggingartakarnar og onnur, sum hava rettindi sambært tryggingaravtalunum,

4) felagsins meginreglur fyri endurtrygging,

5) reglur fyri upplýsingar, sum tey tryggingarsøkjandi skulu lata til metingar av váðanum,

6) reglur fyri útrokning av afturkeypsvirðinum og tryggingarfrískjølum og

7) reglur, sambært hvørjum eftirlønarskipanir við leypandi útgjaldingum, sum eru teknaðar ella avtaluðar sum tvungnar skipanir í einum tryggingarfelag ella einum eftirlønargrunni kunnu verða fluttar frá ella til felagið í sambond við flytan í innað starv.

Stk. 2. Eftirlitið kann áseta nærri reglur um tey viðurskifti, ið nevnd eru í stk. 1.

§ 20. Tey fráboðaðu viðurskiftini skulu vera tryggjandi og rímilig mótvegis tí einstaka tryggingartakaranum og øðrum, sum hava rettindi sambært tryggingaravtalunum.

Stk. 2. Tær fráboðaðu reglurnar fyri útrokning av yvirskoti, jbr. § 19, stk. 1, nr. 4 skulu vera neyvar og greiðar og skulu føra til eitt rímiligt býti.

Stk. 3. Tryggingargjøldini fyri nýteknaðar tryggingar skulu vera nóg stór, sofeiðis at tryggingarfelagið kann lúka sínar skyldur, uttan at tørvur verður á skipaðum og varandi tilflutningi av øðrum ognum.

Stk. 4. Tann ella teir rentusatsir, ið verða lagdir til grundar fyri útrokningini av lívstryggingarburturleggingunum, skulu verða valdir við varni.

Stk. 5. Teir hagfrøðiligu útrokningarpartarnir og útreiðslupartarnir skulu verða valdir við varni.

Stk. 6. Eftirlitið kann seta nærri reglur um tey í stk. 1-5 nevndu krøv.

Stk. 7. Um krøvini í stk. 1-5 ella reglur givnar við heimild í hesi lóg ikki eru lokin, skal Eftirlitið krevja, at lívstryggingarfelagið ger tær neyðugu broytingarnar sambært teimum í § 19 fráboðaðu viðurskiftum innan eina freist, sum Eftirlitið ásetir. Ásetingin í § 172 verður at nýta sumsvarandi.

§ 21. Verða tryggingar teknaðar hóast ásetingina í § 9, stk. 7, 1. pkt., bera tey, sum vegna felagið hava teknað tryggingarnar ella hava medábyrgd fyri hesum, samábyrgd fyri, at avtalan verður lokin. Góðkennir felagið skyldurnar innan 4 vikur eftir skrásetingina, fellur ábyrgdin hjá teimum viðkomandi burtur. Treytað av, at trygdin hjá tryggingartakarunum ikki við hesum versnar avgerandi. Áðrenn felagið hevur góðkent skyldurnar, eru slíkar avtalur ikki bindandi fyri tryggingartakaran.

Stk. 2. Tekning av einum limi í eitt sínámillum felag í samsvari við § 9, stk. 7, 2. pkt., er einans bindandi um felagið verður fráboðað føroyska skrásetingarmyndugleikanum innan eitt ár eftir tekningina. Verður skráseting noktað, dettur avtalan burtur.

§ 22. Ger eitt felag av, at hava eitt virksemi, ið tess loyvi ikki fevnir um, hevur avgerðin ikki gildi fyrr enn Føroyn Landsstýri og Eftirlitið hava givið tað neyðuga loyvið.

Kapittul 4
Ognarvíðurskifti

§ 23. Eftirlitið skal hava fráboðan um og frammanundan góðkenna, at ein líkamligur ella løgfrøðiligur persónur beinleiðis ella óbeinleiðis ognar sær ein serligan lut í einum tryggingarfelag og eisini slíka øking av einum serligum luti, ið hevur við sær, at hesin er ella fer um eitt mark uppá ávikavist 20, 33 og 50 %, ella at tryggingarfelagið verður eitt dóttarfelag.

Stk. 2. Við serligum luti er at skilja beinleiðis ella óbeinleiðis ogn av í minsta lagi 10 prosentum av fæfeinginum ella atkvøðurettindunum ella einum luti, ið gevur møguleika fyri at frenja eina munandi ávirkan á rakstur tryggingarfelagsins.

Stk. 3. Ognan ella øking av lutinum, sum nevnt í stk. 1 kann bert verða góðkend, tú hetta ikki stríðir móti fyrilitinum at tryggja ein fullgóðan rakstur av tryggingarfelagnum. Góðkenning ella noktan felagsins skal vera til taks í seinasta lagi 3 mánaðir eftir fráboðan um ætlaða fløguna.

Stk. 4. Eftirlitið kann, tá góðkenning av ognan ella øking sambæt stk. 1 verður givin, áseta eina freist fyri, nær henda skal vera framd.

Stk. 5. Fæfeingisognarar, sum eiga ein lut uppá í minsta lagi 10 prosent, og sum ætla at minka henda lut soleiðis, at hann kemur undir tey í stk. 1 ásettu mørkini, skulu geva Eftirlitinum fráboðan um hetta og tilskila støddina á tí ætlaða framtíðarlutinum.

Stk. 6. Tí eitt tryggingarfelag fær kunnleika um ognan ella avhending av lutum, sum nevndir í stk. 1 og 5, skal tryggingarfelagið beinan vegin geva Eftirlitinum fráboðan um hetta.

Stk. 7. Tryggingarfeløgini skulu eina ferð um árið innan endan á juni mánað geva Eftirlitinum fráboðan um nøvnini á fáfeingisognarum, sum eiga serligan lut í tryggingarfelagnum, og støddina á hesum lutum.

§ 24. Um so er, at fæfeingisognarar, ið eiga ein av teimum í §23, stk. 1 ásettu lutunum í einum tryggingarfelag, arbeiða í móti einum fullgóðum rakstri av tryggingarfelagnum, kann Eftirlitið seta úr gildi tann atkvøðurætt, ið er knýttur at fæfeingislutunum hjá viðkomandi ognara ella krevja, at tryggingarfelagið fylgir ávísum meginregluni.

Stk. 2. Eftirlitið kann seta úr gildi tann atkvøðurætt, ið er knýttur at fæfeingilutum, sum líkamligir ella løgfrøðiligir persónar eiga, sum ikki halda skylduna í § 23, stk. 1, at geva Eftirlitinum fráboðan frammanundan. Fæfeingislutir fáa aftur fullan atkvøðurætt, um Eftirlitið kann góðkenna ognanina.

Stk. 3. Eftirlitið skal seta úr gildi tann atkvøðurætt, ið er knýttur at fæfeingislutum, sum líkamligir ella løgfrøðiligir persónar eiga, sum hava ognað sær lutir, ið umrøddir eru í § 23, stk. 1, hóast Eftirlitið hevur noktað at góðkenna ognanina av hesum fæfeingislutum.

Stk. 4. Hevur Eftirlitið sett úr gildi atkvøðurættin sambæt stk. 1-3, kann fæfeingisluturin ikki verða tikin við í uppgerðini av tí á aðalfundi umboðaða fæfeinginum, sum hevur atkvøðurætt.

Kapittul 5
Fæfeingisgrundarlagið í tryggingarpartafelogum

§ 25. Tryggingarpartafeløg skulu fyri at kunna reka virksemi hava eitt grundarfæfeingi. Tann neyðuga støddin á grundarfæfeinginum verður avgjørt við útrokning av felagsins gjaldførisbreddu.

Stk. 2. Gjaldførisbreddin verður útroknaður við stuði í slagnum og vavinum av virkseminum, tó soleiðis, at ásett verður ein minstaupphædd einans eftir slagnum av virkseminum. Føroya Landsstýri kann við almennum fyriskipanum áseta eina lægri minstaupphædd fyri bólkar av felogum, fyri hvørji serstøk viðurskifti gera seg galdandi.

Stk. 3. Føroya Landsstýri ásetir reglur um, hvussu gjaldførisbreddin verður útroknaður, og um í hvørjum mun partapeningurin (felagsfæfeingið), trygdargrunnur og onnur tiltøk kunna verða roknað uppí grundarfæfeingið, og um heimildir Eftirlitsins í sambond við metingina av rokskapi felagsins at loyva, at onnur viðurskifti verða tikin við í metingini av, um grundarfæfeingið hjá felagnum er nóg stórt.

Stk. 4. Hóast støddina á grundarfæfeinginum skal partapeningurin í minsta lagi vera tann upphæddin, sum er ásett í partafelagslógini.

Stk. 5. Tað áliggur felagnum at rokna støddina á tí neyðuga partapeninginum og øðrum grundarfæfeingi.

Henda útrokning er partur av rakstrarætlanini, jbr. § 18.

Stk. 6. Henda broytingar í viðurskiftum felagsins sum gera, at óttast má fyri, at grundarfæfeingið, tá rokn-skaparárið endar, ikki fer at samsvara tí ætlaða gjaldførisbreddanum, skulu reglurnar í §§ 171-173 verða nýttar.

Kapittul 6
Sínámillum Tryggingarfelog

§ 26. Við teimum neyðugu tillagingunum og við teimum frávikum, ið standast av reglunum í hesi lóg verða reglurnar í §§ 2-10, § 11, stk. 1 og 3, § 12, stk. 1-4, § 13, §§ 29-38, §§ 49-55a, § 56, stk. 4, §§ 57 og 58, §§ 61-64, § 111, stk. 2 og 3, §§ 112-114, §§ 115-118, §§ 120-126, §§ 134 a-134 c, § 134 e, stk. 1 og 2, 1. pkt., og stk. 4-6, §§134 i-134 k, kapittul 16, kapittul 19, § 160, § 161 og §§ 176–178 í partafelagslógini at nýta samsvarandi á sínámillum tryggingarfeløg.

Stk. 2. Í teimum í stk. 1 nevndu reglum í partafelagslógini verða reglurnar viðvíkjandi partaeigarum at nýta á ábyrgdarnar og reglurnir um partapening og partabrøv at nýta viðvíkjandi ábyrgdarpeningi og ábyrgdarpørtum við neyðugum tillagingum.

Stk. 3. Øll, sum hava atkvøðurætt sambært uppskoti til stovningarskjal ella viðtøkur, skulu taka undir við avgerð sambært § 9, stk. 2 í partafelagslógini. Samtykki sambært § 11, stk. 2, 3. pkt. í partafelagslógini skal verða givið av øllum stovnarum og øllum, sum hava atkvøðurætt sambært uppskoti til stovningarskjal ella viðtøkur.

Stk. 4. §§ 112 og 113 í partafelagslógini um útgjald til partaeigarar skulu nýtast samsvarandi á rentu til ábyrgdarar og útgjald til limir í sínámillum tryggingarfeløgum.

§ 27. Sínámillum tryggingarfeløg skulu fyri at kunna reka virksemi hava ábyrgdarpening ella annað grundarfæfeingi.

Stk. 2. Ásetingarnar í § 25, stk. 1-3 og 5-6, um grundarfæfeingi og útrokning av gjaldførisbredda, verða við teimum undantøkum, ið fylgja av stk. 3-5 niðanfyri, at nýta samsvarandi á sínámillum tryggingarfeløg.

Stk. 3. Minst loyvdi gjaldførisbreddi hjá sínámillum feløgum kann vera triggjar fjórðingar av teirri sambært § 25, stk. 2 ásettu minstuupphæddini.

Stk. 4. Eru tryggingargjøldini skiftandi sambært teimum gjørdu tryggingaravtalunum, soleiðis at tryggingargjaldið eftirfylgjandi kann verða hækkað við fyriliti til váðagongd tryggingarmongdarinnar, kann eyka tryggingargjald, sum kundi hava verið kravt frá tryggingartakarunum í einum roknskaparári, verða fróknað grundarfæfeinginum, tá roknskaparárið endar. Upphæddin kann, um ikki høvið til uppkrevjing av eyka tryggingargjøldum er óavmarkað, tó ikki vera hægri enn helvtina av munimum millum tey eyka tryggingargjøld, sum í mesta lagi kundu verið kravd, og tey veruliga kravdu eyka tryggingargjøld. Tann upphæddin, sum grundað á eitt høvi at krevja eyka tryggingargjøld verður fróknað grundarfæfeinginum, kann ikki vera størri enn helvtin av gjaldførisbreddanum.

Stk. 5. Reglurnar í stk. 4 eru ikki galdandi fyri lívstrygging.

§ 28. Í sínámillum tryggingarfelagum skal allur ábyrgdarpeningurin vera inngoldin, áðrenn felagið kann verða skrásett hjá tí føroyska skrásetingarmyndugleikanum.

§ 29. Ábyrgdarpeningurin kann ikki verða lækkaður uttan samtykki frá Eftirlitinum.

Stk. 2. Ábyrgdarpeningurin kann verða afturgoldin í samsvari við tær í viðtøkunum ásettu reglur. Eftirlitið kann gera av, at samsvarandi burturleggingar verða gjørdar í ein stovnsgrunn ella ein annan grunn, ið ikki kann verða minkaður uttan loyvi frá Eftirlitinum.

§ 30. Ábyrgdarpeningurin kann bera rentu í samsvari við tær í viðtøkunum ásettu reglur, jbr. tó §§ 76, 77 og 78, stk. 2.

Kapittul 7
Limirnir í sínámillum tryggingarfelognum og teirra ábyrgd fyri skyldum felagsins.

§ 31. Limirnir í einum sínámillum tryggingarfelag eru tryggingartakarar felagsins, og bert hesir.

Stk. 2. Limirnir bera ábyrgd fyri skyldum felagsins í tann mun, sum viðtøkurnar ásetta.

Stk. 3. Bert felagið kann gera ábyrgd limanna fyri skyldum felagsins galdandi

Stk. 4. Krav felagsins móti limum um líkan av ábyrgdini fyri skyldum felagsins kann ikki verða avbendað ella veðsett.

§ 32. Eftirlitið kann áseta reglur fyri tey sínámillum tryggingarfeløgini viðvíkjandi ábyrgdini hjá limum og ábyrgdarum, afturgjalding av ábyrgdarpeningi og treytum fyri úthýting til limirnar av ognum felagsins.

§ 33. Verður eitt tryggingarfelag við endurtrygging tryggingartakari í einum sínámillum felag, kann tað við heimild í viðtøkumum verða avtalað, at tað skal vera frítikið fyri limaábyrgd. Tann samlaða upphæddin á tílíkum endurtryggingum fyri egna rokning, kann tó fyri lívstryggingar ikki fara upp um 10 prosent av samlaðu tryggingarupphæddini hjá móttakandi felagnum. Fyri lívrentutrygging skal, tá henda útrokning verður gjørd, tryggingarhæddin verða roknað til tað sama sum 10 ferðir árliga rentuupphæddin. Fyri skaðatrygging kann tryggingargjaldið av tílíkum endurtryggingum ikki uttan løyvi Eftirlitsins fara upp um 10 prosent av felagsins samlaðu tryggingargjaldsinntøku.

Kapittul 8
Iungjalding av ábyrgdarpørtum v.m.

§ 34. Eitt sínámillum tryggingarfelag, kann ikki móti viðurlag ogna sær egnar ábyrgdarpartar, sum ogn ella veð.

Stk. 2. Dótturfeløgini hjá einum sínámillum tryggingarfelag kunnu ikki móti viðurlag, sum ogn ella veð, ogna sær ábyrgdarpartar í móðurfelagnum.

§ 35. Í sínámillum tryggingarfeløgum skulu ábyrgdarpartarnir føraslí í eina bók.

Stk. 2. Ábyrgdarpartarnir skulu skrivast upp í bókina við upplýsing um navn, starv og bústað ábyrgdarans.

Stk. 3. Felagið skal geva ábyrgdarpartinum átekning um bókingina.

Kapittul 9
Leiðslan í tryggingarfeløgum

§ 36. Í lívs- og eftirlønartryggingarpartafeløgum, tilnevnir Føroya Landsstýri ein lim í nevndina.

§ 37. Nevndin og stjórnin hava skyldu til at seta pening felagsins á ein bóskandi og fyri tryggingartakararnar vinnandi hátt soleiðis, at felagið altíð kann lúka sínar skyldur.

§ 38. Stjórnin skal syrgja fyri, at felagið hevur nóg stóran sakkunnleika til útrokning av tryggingarligum hurturleggingum.

Stk. 2. Hevur felagið loyvi til at reka lívstryggingarvirksemi, skal tað, til tess at røkja tær neyðugu tryggingartøknilígu uppgávurnar heruppí útrokningar og kanningar, verða settur í starv ein ábyrgdarhavandi tryggingarfrøðingur, ið Eftirlitið hevur góðkent.

Stk. 3. Søkir eitt felag Eftirlitið um góðkenning av einum nýggjum ábyrgdarhavandi tryggingarfrøðingi, skal umsóknin hava grundgeving fyri orsøkini til skiftið.

Stk. 4. Tann ábyrgdarhavandi tryggingarfrøðingurin skal ansa eftir, at felagið heldur sítt tekniska grundarlag, v.m. Tann tryggingarkøni skal í hesum sambandi ganga ígjøgnum tað tryggingarliga innihaldið í virksemi felagsins og annað tilfar, heruppí marknaðurføringartiltar og ábótarforsagnir, og ansa eftir, at tað tøkniliga grundarlagið v.m. jbr. § 19, altíð er í samsvari við tey í § 20, stk. 1-5, nevndu krøv.

Stk. 5. Ábyrgdarhavandi tryggingarfrøðingur, skal beinanvegin boða Eftirlitinum frá einumhvørjum broti á tey í stk. 4 nevndu viðurskilti. Tryggingarfrøðingurin hevur rætt til at krevja allar upplýsingar frá stjórnini, sum eru neyðugar til innan av starvinum. Eftirlitið kann krevja tær upplýsingar frá tryggingarfrøðinginum, sum eru neyðugar til metingar av fíggjarligu stoðu felagsins.

Stk. 6. Ábyrgdarhavandi tryggingarfrøðingur skal senda Eftirlitinum árliga frágreiðing.

Stk. 7. Eftirlitið skal áseta nærri reglur um tey í stk. 2-6 nevndu viðurskilti.

§ 39. Stjórar í tryggingarfeløgum kunnu ikki fyri egna rokning handla ella vera við í handlum til peningagróðurs.

Stk. 2. Stjórar í tryggingarfeløgum kunnu ikki uttan loyvi frá nevndini eiga ella reka sjálvstøðugt vinnuvirki ella sum nevndarlimir, starvsfólk ella á annan hátt taka lut í feiðslum ella rakstrinum í einum øðrum

vinnuvirki enn viðkomandi felag ella feløgum innan somu samtøku. Teir kunnu tó eiga fasta ogn, og reka og taka lut í fyrisitingini av fastari ogn.

§ 40. Nevndin velur sjálv sín formann, um ikki annað er ásett í viðtøkunum. Standa atkvøðurnar á jovnum verður valið avgjørt við lutakasti. Formaðurin í nevndini kann ikki samstundis vera limur í stjórnini ella starvsfólk í felagnum. Meirilutin av limunum í nevndini skulu vera persónar, ið ikki eru stjórar ella starvsfólk í felagnum.

Stk. 2. Formaðurin skal síggja til, at nevndin hevur fund, tá hetta er neyðugt, og skal ansa eftir, at allir limir fáa fundarboð. Ein og hvør limur í nevndini, ein stjóri, ein valdur grannskoðari ella tann ábyrgdarhavandi tryggingarfrøðingurin kann krevja, at nevndin verður kallað saman. Ein stjóri, ein valdur grannskoðari og tann ábyrgdarhavandi tryggingarfrøðingurin hevur rætt til at vera til staðar og siga sína áskoðan tá nevndarfundur er, um ikki nevndin í tí einstaka málinum tekur eina aðra avgerð.

Stk. 3. Um nevndarfundirnar skal førast gerðabók, ið verður undirskrivað av øllum limunum, sum eru til staðar. Ein nevndarlimur, ein stjóri, ábyrgdarhavandi tryggingarfrøðingur ella ein grannskoðari, ið ikki er samdur í avgerð nevndarinnar, hevur rætt til at fáa sína áskoðan førda í gerðabókina.

Stk. 4. Reglurnar í stk. 1-3 verða at nýta samsvarandi á umboðsráðið.

§ 41. Ein stjóri kann ikki uttan nevndarinnar góðkenning gera sáttmála millum felagið og hann sjálvan ella sáttmála millum felagið og triðjamann, í hvørjum hann hevur stór áhugamál, ið kunnu stríða móti felagsins.

§ 42. Limir í nevnd og stjórn umboða felagið úteftir.

Stk. 2. Felagið verður bundið av rættargerðum, sum øll nevndin ella limir í nevndini ella stjórnini gera felagsins vegna, jbr. tó stk. 3.

Stk. 3. Tann tekningarrættur, sum limir í nevndini ella stjórnini hava sambært stk. 2, kann einans verða framdur av 2 í felag. Hesin tekningarrættur kann í viðtøkunum verða enn meira avmarkaður soleiðis, at tekningarrætturin einans kann verða framdur av 2 ella fleiri ávísum persónum í felag ella av fleiri enn 2 í felag. Aðrar avmarkingar í tekningarrættinum kunnu ikki verða skrásettar.

Stk. 4. Einans nevndin kann veita umboðsfulltrú. Umboðsfulltrúar kunnu einans 2 saman tekna felagið ella saman við einum av teimum í stk. 2 nevndu persónum.

§ 43. Um nevndarlimir, umboð ella stjórar í samband við luttøku í umboðssøluvirki ella millumgonguvirki ella vegna fíggjarlig áhugamál í tílíkum virkjum fáa sær umboðsløn ella aðra inntøku av tryggingum, sum felagið tekur ímóti ella veitir, skal hetta fráboðast Eftirlitinum.

Kapitlul 10
Aðalfundur í sínámillum tryggingarfeløgum

§ 44. Rættur limanna og ábyrgdaranna at taka avgerð í felagnum verður framdur á aðalfundinum. Hvør limur skal hava í miusta lagi eina atkvøðu.

Stk. 2. Hóast stk. 1, kunnu viðtøkurnar áseta, at aðalfundurin er samansettur av umboðsfólki, ið limirnir og ábyrgdararnir ella teirra varamenn hava valt.

Stk. 3. Limir og ábyrgdarar hava rætt at møta á aðalfundi og at taka orðið har, sjálvt um teir ikki hava atkvøðurætt á aðalfundinum. Viðtøkurnar kunnu áseta, at limir og ábyrgdarar fyri at kunna møta á aðalfundinum skulu hava boðað felagnum frá teirra luttøku eina ávísa tíð, tó í mesta lagi 5 dagar, innan aðalfundin.

§ 45. Tey, ið hava atkvøðurætt á aðalfundinum, kunnu ikki sjálvi við fulltrúa ella sum fulltrúar fyri onnur taka lut í atkvøðugreiðslu á aðalfundinum um rættarmál móti teimum sjálvum ella um teirra egnu ábyrgd mótvegis felagnum ella um rættarmál móti øðrum ella um ábyrgdina hjá øðrum, um so er, at tey hava stóran áhuga í hesum, sum kann stríða móti áhugamálum felagsins. Hesi verða ikki íroknað, tá avgerast skal, um tað til viðtøkuna neyðuga talið á teimum, sum hava atkvøðurætt, hevur verið umboðað.

§ 46. Aðalfundurin skal vera her í landinum. Hann verður hildin á heimstaði felagsins, um ikki viðtøkurnar ella aðalfundurin avgera, at hann skal ella kann verða hildin á einum øðrum nærri ásettum stað. Um tað undir serstøkum umstøðum er neyðugt, kann aðalfundurin verða hildin aðrastaðni.

§ 47. Innan 6 mánaðir eftir, at hvørt rokniskaparár er endað, skal regluligur aðalfundur verða hildin. Á hesum skal leggjast fram ársrokniskapur og grannskoðaraátekning og ársfrágreiðing.

Stk. 2. Á aðalfundinum skal avgerð verða tikin um:

1) góðkenning av úrslitauppgerð og fíggjarstoðu (fíggjarjavna),
2) nýtslu av avlopi ella rindan av halli sambæru góðkenda rokniskapinum,
3) aðrar spurningar, sum sambært viðtøkum felagsins liggja hjá aðalfundinum.

§ 48. Eykaaðalfundur skal verða hildin, tá nevndin ella ein av grannskoðarunum metir tað hóskandi. Um ein tíggjundapartur av teimum, sum hava atkvøðurætt, ella ein minni brotpartur, sum viðtøkurnar mannu áseta, skrivliga krevur tað, skal boðast til eykaaðalfundar innan 14 dagar til at viðgera eitt ávíst tilskilað evni.

§ 49. Ein og hvør, ið hevur atkvøðurætt, hevur rætt at fáa eitt ávíst evni viðgjørt á aðalfundinum, um hann skrivliga setir fram krav um hetta mótvegis nevndini í so góðari tíð, at evnið kann verða tikið við á dagsskránna fyri aðalfundin.

§ 50. Nevndin boðar til aðalfundar.

Stk. 2. Hevur felagið onga nevnd, ella letur nevndin vera við at boða til aðalfundar, sum skal haldast sambært lógini, viðtøkunum ella eini aðalfundaravgerð, boðar stjórin fyri Eftirlitið til aðalfundar, um ein nevndarlimur, ein stjóri, ein grannskoðari ella ein, sum hevur atkvøðurætt á aðalfundi, krevur tað. Stjórin fyri Eftirlitið, ella ein sum hann hevur givið fullmakt til tess, leiðir ein soleiðis boðaðan aðalfund, og nevndin skal geva honum ein lista við teimum sum hava atkvøðurætt, aðalfundargerðabókina og grannskoðarnarbókina. Eftirlitið rindar fyribils útreiðslurnar av aðalfundinum, men verða tær endaliga bornar av felagnum.

§ 51. Boðast skal til aðalfundar í fyrsta lagi 4 vikur áðrenn og, um ikki viðtøkurnar fyriseta eina longri freist, í seinasta lagi 8 dagar áðrenn aðalfundin. Verður aðalfundurin útsettur til ein dag, sum fellur meira enn 4 vikur seinni, skal boðast til tann framhaldandi aðalfundin. Um gildi hjá eini aðalfundaravgerð í viðtøkunum er gjørt treytað av viðtøku á 2 aðalfundum, kann ikki verða boðað til tann næsta aðalfundin fyrr enn tann fyrsti er hildin, og í boðunum skal verða sagt frá, hvørja avgerð tann fyrsti aðalfundurin hevur tikið.

Stk. 2. Á heimstaði felagsins skulu fundarboðini vera almenn og annars í samsvari við reglurnar í viðtøkunum. Teir limir, ið hava ynski tað, skulu hava skrivlig fundarboð. Fráboðan um fundarboð skal eisini verða latin starvsfólki felagsins, um hesi hava givið fráboðan til nevndina sambært § 26, jbr. § 177, stk. 1, 2. pkt. í partafelagslógini. Fráboðan um fundarboð skal viðvíkjandi móðurfeløgum eisini verða givin starvsfólkinum í samtøkuni, um starvsfólkini í dótturfeløgunum hava givið nevndini fráboðan sambært § 26, jbr. § 177, stk. 1, 2. pkt. í partafelagslógini.

Stk. 3. Í boðunum skal vera upplýst, hvørji mál skulu viðgerast á aðalfundinum. Um uppskot til broytingar í viðtøkunum skal viðgerast á aðalfundinum, skal í fundarboðunum vera sagt frá hovuðsinnihaldinum í uppskotinum.

Stk. 4. Í seinasta lagi 8 dagar áðrenn aðalfundin skal dagsskráin og tey fullfíggjaðu uppskotini og viðvíkjandi til regluliga aðalfundinum eisini ársrokniskapurin og grannskoðarnarfrágreiðingin – og í móðurfeløgum eisini samtøkurokniskapurin – leggjast fram á skrivstovu felagsins til skuðnar hjá limum og ábyrgdarum.

§ 52. Í málum, ið ikki eru á dagsskránni, kann aðalfundurin einans taka avgerð, um øll, ið hava atkvøðurætt, taka undir við hesum. Tó kann regluligt aðalfundurin aftíð taka avgerð í málum, sum sambært viðtøkunum skulu viðgerast á einum tilíkum aðalfundi, eins og avgjørt kann verða, at boða til eykaaðalfundar fyri at viðgera eitt ávíst evni.

§ 53. Ein fundarstjóri leiðir aðalfundin, ið, um ikki viðtøkurnar áseta annað, verður valdur av aðalfundinum.

Stk. 2. Um viðgerðirnar á aðalfundinum skal verða ført gerðabók, ið fundarstjórin undirskrivar.

Stk. 3. Í seinasta lagi 14 dagar eftir aðalfundin skal aðalfundargerðabókin ella ein váttað úrskrift úr henni verða atkomulig fyri limir og ábyrgdarar á skrivstovu felagsins.

§ 54. Nevndin og stjórin skulu, tá ein limur ella ein ábyrgdari krevur tað og uttan mun til, um hesir ikki hava atkvøðurætt, ella eitt umboðsfólk krevur tað, og tað eftir meting nevndarinnar kann verða gjørt uttan

týðandi skaða fyri felagið, á aðalfundinum veita tær upplýsingar, sum felagið ræður yvir, um øll viðurskifti, sum hava týðning fyri metingina av ársrokn skapinum og støðu felagsins annars ella fyri spurningar, sum avgerð skal verða tikin um á aðalfundinum. Upplýsingarskyldan er eisini galdandi um viðurskiftini til onnur feløg í sonnu samtøku.

Stk. 2. Um svarið krevur upplýsingar, sum ikki eru atkomandi á aðalfundinum, skulu upplýsingarnar innan 14 dagar eftir hetta skrivliga leggjast fram í felagnum fyri limir, ábyrgdarar og umboðsfólk, eins og tær skulu sendast limum, ábyrgdarum ella umboðsfólki, sum hava biðið um tað.

§ 55. Á aðalfundi verða øll mál avgjørd við vanligum meiriluta um ikki henda lög ella viðtøkurnar ásetta annað. Standa atkvøðurnar á jøvnum, skal val verða avgjørt við lutakasti, um ikki annað er ásett í viðtøkunum.

§ 56. Avgerð um broyting í viðtøkunum verður tikin á aðalfundinum, jbr. tó § 26, jbr. § 38 í partafelagslógini. Avgerðin er bert gyldug, um í minsta lagi tveir triðingar av teimum greiddu atkvøðunum, taka undir við henni. Avgerðin skal í aðramáta lúka tær treytir, sum munnu vera ásettar í viðtøkunum.

Stk. 2. Stórar broytingar í endamálinum hjá einum felag, kunnu, um ikki annað er ásett í viðtøkunum, einans verða samtyktar, tá tríggir fjórðingar av ábyrgdarunum og tríggir fjórðingar av limunum ella, um aðalfundurin er samansettur av umboðsfólki, trimum fjórðingum av teimum tekur undir við teimum. Frá-boðan til ábyrgdarar um tílíkar broytingar skal verða givin innan 8 dagar eftir avgerðina á aðalfundinum. Ábyrgdarar, sum eru ímóti tílíkum broytingum, kunnu, tá teir innan 1 mánað eftir aðalfundin setja fram ábeitan um hetta, krevja, at hinir ábyrgdararnir skulu yvirtaka teirra ábyrgdarpartar.

§ 57. Rættarmál vegna eina aðalfundarsamtykt, sum ikki er tikin á lógligan hátt ella sum stríðir ímóti hesi lóg ella viðtøkum felagsins, kann ein sum hevur atkvøðurætt, ein limur í nevndini ella ein stjóri byrja.

Stk. 2. Málið skal vera lagt fyri rættin innan 3 mánaðir eftir avgerðina. Annars verður avgerðin metta gildug.

Stk. 3. Ásetingarnar í stk. 2 eru ikki galdandi:

1) tá avgerðin ikki lógliga kundi verið tikin hóast øll, sum høvdu atkvøðurætt, tóku undir við henni,

2) tá tað sambært viðtøkum felagsins er neyðugt, at allir ella ávísir limir, ábyrgdarar ella onnur, sum hava atkvøðurætt, taka undir við avgerðini, og hetta ikki er gjørt,

3) tá aðalfundarboð ikki eru givin ella tær fyri felagið galdandi reglur fyri fundarfráboðan í stóran mun ikki eru hildnar,

4) tá persónur, ið hevur lagt mál fyri rættin aftanfyri tala í stk. 2 ásetta freist, men tó innan 2 ár eftir avgerðina, hevur havt rímiliga orsøk til seinkanina og rætturin tessvegna og við atliti til umstøðurnar annars metir, at um stk. 2 verður nýtt, hevði hetta verið eyðsýnt óhóskandi.

Stk. 4. Metir rætturin, at aðalfundaravgerðin kemur undir ásetingina í stk. 1, skal hon við dómi verða ógildað ella broytt. Aðalfundaravgerðin kann tó einans verða broytt, um krav verður sett fram um hetta, og rætturin er førur fyri at gera av, hvat innihald avgerðin av rættum skuldi hava. Rættarins avgerð hevur gildi mótvegis øllum limum og ábyrgdarum.

Kapitul 11
Ársroknskapur og samtøkuroknskapur v.m.

§ 58. Fyri hvørt roknskaparár gera nevndin og stjórnin í samsvari við lógarinnar og viðtøkunnar reglur ein ársroknskap, sum hevur figgjarjavna (figgjarstøðu), ársúttaupptgerð, viðmerkingar og finnanrayvirlit. Eisini verður gjørd ársfrágreiðing og í móðurfeløgum ein samtøkuroknskapur. Hesir partar eru eina heild.

Stk. 2. Ársroknskapur og ársfrágreiðing og ein meguligur samtøkuroknskapur verður undirskrivaður av stjórnini og nevndini. Um ein stjóri ella ein nevndarlimur metir, at ársroknskapurin ella ársfrágreiðingin ikki eigur at verða góðkend, ella hevur hann aðrar atfinningar móti hesum ella í einum móðurfelag móti samtøkuroknskapinum, sum hann ynskir at gera aðalfundin kunnugan við, skal hann greiða frá hesum í sínari átekning.

§ 59. Roknskaparin skal fevna um 12 mánaðir. Tó kann fyrsta roknskaparskeiðið fyri einum felag fevna um eitt styttri ella longri tíðarskeið, tó í mesta lagi 18 mánaðir. Seinni umskipan av roknskaparárinum kann verða gjørd, tá serstakar umstøður tala fyri tí. Umskipanartíðarskeiðið skal tá fevna um eitt styttri tíðarskeið

enn tólv mánaðir. Umskipanin skal verða nevnd í viðmerkingunum við hóskandi grundgeving.

Stk. 2. Fyritøkur, sum hoyra til somu samtøku, skulu hava sama roknskaparár, um ikki serstakar umstøður tala fyri øðrum. Um tað er neyðugt, tá ein samtøka verður gjørd, at umskipa roknskaparárið hjá einum dótturfelag ella einum móðurfelag, kann umskipanin hóast stk. 1, pkt 4. fevna um í mesta lagi 18 mánaðir.

§ 60. Ársroknskapurin skal verða uppsettur, so tað er lætt at fáa yvirlit, og í samsvari við hesa lóg og reglur við heimild í hesi lóg.

Stk. 2. Ársroknskapurin skal geva eina rættvísandi mynd av felagsins ognum og skuld, tess fíggjarligu støðu og úrslitinum.

Stk. 3. Um nýtslan av ásetingunum í hesi lóg ella fyriskipanum sambært lógini ikki á nóg góðan hátt geva eina rættvísandi mynd søleiðis sum nevnt í stk. 2, skulu fleiri upplýsingar verða givnar í ársroknskapinum.

Stk. 4. Um nýtslan av eini áseting í hesum kapitli ella eini fyriskipan sambært § 64 í serstøkum førum fer at stríða í móti kravinum til ársroknskapin í stk. 2, skal verða vikið frá hesum søleiðis, at hetta krav verður lokið. Eitt slíkt frávik skal verða nevnt í viðmerkingunum og hóskandi grundgivið við upplýsing um, hvørja ávirkan - heruppií so vítt gjørligt ta peningaligu ávirkanina - frávikið hevur á felagsins ognir og skuld, tess fíggjarligu støðu og úrslit.

§ 61. Lýkur ársroknskapurin ikki krøvini í lógarinnar ásetingum ella viðtøkum felagsins, kann Eftirlitið krevja roknskapin broyttan og lagdan fram til nýggja viðgerð á einum aðalfundi.

§ 62. Bókingarnar í ársroknskapinum verða virðismettar í samsvari við fylgjandi vanligu meginreglur:

1) Felagið verður mett at halda áfram við sínum virksemi.

2) Virðismetingarháttirnir kunnu ikki verða broyttir frá einum roknskaparári til tað næsta.

3) Virðismetingin skal í øllum førum verða gjørd við hóskandi varni og serstakliga søleiðis:

a) at einans tann vinningur, ið er staðfestur tá fíggjarjavnin verður gjørdur upp, verður tikin við,

b) at fyrilit verður tikið fyri øllum váða, sum roknast kann við og møguligum tapi, sum er íkomið í tí roknskaparárinum, sum ársroknskapurin viðvíkur, ella í einum roknskaparári frammanundan, sjálvt um hesin váði ella hetta tap ikki verður kent fyrr enn millum fíggjarjavnatíðina og ta tíðina, tá ársroknskapurin verður gjørdur, og

c) at fyrilit verður tikið fyri einhvørjari virðislækkan antin ársroknskapurin vísir hall ella vinning.

4) Fyrilit skal verða tikið fyri inntøkum og útreiðslum viðvíkjandi tí árinum, sum roknskapurin fevnir um, uttan inn til gjaldtíðina.

5) Virðið á teimum einstøku ognar- og skuldarskrásetingunum skal ásetast hvørt sær.

6) Byrjanarjavnin fyri hvørt árið skal vera samsvarandi honum fyri árið frammanundan.

Stk. 2. Eftirlitið kann áseta reglur, sambært hvørjum vikið verður frá stk. 1, nr. 3, litra a, fyri at taka fyriliti fyri virðisøkingini á ávísum ognum, skuldarskrásetingum og burturleggingum.

Stk. 3. Harumframt kann í undantaksførum verða vikið frá teimum vanligu meginreglunum í stk. 1. Møgulig frávik skulu verða tilskilað í viðmerkingunum og skulu verða hóskandi grundgivin, eins og teirra ávirkan – heruppií um tað er gjørligt peningaliga ávirkanin – á felagsins ogn og skuld, fíggjarligu støðu og úrslitið skal verða tilskilað.

§ 63. Verður vikið frá § 62, stk. 1, nr. 2, skal ársroknskapurin fyri tað árið, broytingin verður framd, verða gjørdur sambært nýggja háttinum. Samlaða peningaliga ávirkanin á felagsins ogn og skuld, tess fíggjarligu støðu og úrslitið skal verða tilskilað í viðmerkingunum. Hetta er eisini galdandi fyri ávirkanina á skattin av ársins úrsliti og møguligan skatt.

Stk. 2. Viðkomandi skrásetingar verða broyttar í samsvari við tann nýggja háttin í byrjanarjavnanum fyri tað árið, sum broytingin verður gjørd í.

§ 64. Ársroknskapurin skal annars verða gjørdur í samsvari við reglur sum Eftirlitið hevur ásett, heruppií reglur um uppgerð og virðisáseting av tryggingarligum burturleggingum.

Stk. 2. Eftirlitið ásetir eisini reglur um ger av samtøkuroknskapum.

Stk. 3. Eftirlitið kann gera av, at feløg, ið ikki hava loyvi at reka tryggingarvirksemi, skulu gera samtøkuroknskapir sambært reglum ásettar sambært stk. 2, tá virksemið hjá viðkomandi felag einans ella í høvuðsheitunum er, at eiga ognarpartar í dótturfeløgum, ið einans ella í høvuðsheitunum reka tryggingarvirksemi.

§ 65. Ársfrágreiðingin skal hava eina álitandi frágreiðing um gongdina í felagsins fíggjarliga virksemi og viðurskiftum. Um ársroknskapurin í stóran mun er ávirkaður av óvanligum viðurskiftum, og um tað er stór óvissa í uppgerðini av ársroknskapinum, skal hetta verða upplýst í einum serstøkum parti av frágreiðingini. Upplýsingarnar skulu verða givnar hvør sær og um gjørligt við tilskilan av upphæddi.

Stk. 2. Ársfrágreiðingin skal eisini umrøða:

1) týdningarmiklar hendingar, sum hava verið, eftir at roknskaparárið er endað,

2) hvussu framgongdin hjá felagnum væntandi fer at verða og

3) virksemi til framleiðslu- og skipanarmenning.

Stk. 3. Nevndin skal í ársfrágreiðingini ella í sambandi við úrslitauppgerð ella fíggjarjavnu seta fram uppskot til samtyktar viðvíkjandi nýtslumi av felagsins yvirskoti ella rindan av halli.

Stk. 4. Ársfrágreiðingin hjá einum móðurfelag skal hava upplýsing um samtøkuna í sínu heild í samsvari við reglurnar í stk. 1 og 2.

§ 66. Beinanvegin eftir tann nevndarfundin, tá ársroknskapurin er góðkendur, og í seinasta lagi 8 dagar áðrenn aðalfundin, skal verða sent Eftirlitinum:

1) tann ársroknskapurin, ið er nevndur í § 73, stk. 5 í partafelagslógini ella tann ársroknskapurin, ið er nevndur í § 51, stk. 4 og

2) úrskrift úr grannskoðannarbókini viðvíkjandi grannskoðanini av ársroknskapinum.

Stk. 2. Í seinasta lagi 10 dagar eftir at roknskapurin er endaliga samtyktur og góðkendur, skal verða sent Eftirlitinum:

1) 2 eintøk av tí av aðalfundinum góðkenda ársroknskapinum, heruppá samtøkuroknskapi við grannskoðannarátekning og ársfrágreiðing við upplýsing um, nær ársroknskapurin er góðkendur. Er samtykta býtið av yvirskoti ella fígging av halli ikki sett inn í ársroknskapin ella ársfrágreiðingina, verður eisini send ein váttað úrskrift úr aðalfundargerðabókini, ið vísir hetta býtið ella fíggingina.

2) Eitt móðurfelag skal eisini senda inn grannskoðaða roknskapin hjá dóturfelagunum.

Stk. 3. Innsendan sambæt stk. 2 av ársroknskapum v.m. fyri tryggingarfelóg, hvørs partabrøv ella lánsbrøv verða virðisskrásett alment, skal tó fara fram í seinasta lagi fimm mánaðir eftir at roknskaparárið er endað.

Stk. 4. Stk. 1-3 eru galdandi samsvarandi fyri felóg, ið ikki hava loyvi at reka tryggingarvirksemi, tá felagið ger samtøkuroknskap sambæt reglunum í hesi lóg, jbr. § 64, stk. 3.

Stk. 5. Eftirlitið gevur tí føroyska skrásetingarmyndugleikanum tann eina av roknskapunum, ið nevndir eru í stk. 2, nr. 1, og kunngerð móttøkuna í almenna føroyska Kunngerðarblaðnum. Teir móttiknu roknskapirnir eru atkomuligir hjá almenninginum hjá tí føroyska skrásetingarmyndugleikanum.

§ 67. Eftirlitið kann krevja ársroknskaparupphæddirnar og nærri útgreiningar av hesum gjørdar á serstøk oyðublløð at nýta í metingini av fíggjarligu støðu felagsins og gerð av árligu frágreiðing Eftirlitsins.

Stk. 2. Eftirlitið kann afturat teimum oyðibleðum, sum nevnd eru í stk. 1, krevja frágreiðingar um einstøk viðurskifti undirskrivað av felagsins stjórn, nevnd, grannskoðarum ella ábyrgdarhavandi tryggingarfróðingi.

Stk. 3. Tey oyðublløð og frágreiðingar, ið eru nevnd í stk. 1 og stk. 2, verða innsend eftir reglum, sum Eftirlitið hevur ásett.

§ 68. Ger felagið eina fullfíggjaða kunngering av ársroknskapinum og ársfrágreiðingini og einum møguligum samtøkuroknskapi, skal hetta verða gjørt í tí formi og samanseting, sum hetta er vorðið grannskoðað og við grannskoðannarátekning. Hevur grannskoðarin tikið fyrivarni ella noktað at átekna roknskapin, skal hetta verða fráboðað og grundgivið. Um tað uppskotna ella samtykta býtið av yvirskoti ella fíggingin av atpi ikki er sett inn í tær viðkomandi upphæddirnar í fíggjarjavnanum, skal uppskotið ella samtyktin verða tikin við í kunngeringini.

Stk. 2. Tá ein kunngering fer fram av ársroknskapinum v.m., ið ikki er fullfíggjað, skal tað greitt gangga fram av tí kunngjørda, at ársroknskapurin er styttur, og at tann fullfíggjaði ársroknskapurin er atkomuligur hjá tí føroyska skrásetingarmyndugleikanum ella at ársroknskapurin enn ikki er sendur Eftirlitinum. Tað er ikki neyðugt at grannskoðannarátekningin er við í eini styttari kunngering, men tað skal greitt siggjast í kunngeringini, um grannskoðarin hevur tikið fyrivarni, ella um grannskoðannarátekning er noktað.

Kapittul 12
Íløgureglur

§ 69. Tryggingarfeløg skulu umframt ognir, ið samsvara gjaldførisbreddanum, altíð hava ognir sum § 70 fevnir um fyri eitt samlað virði, sum í minsta lagi samsvarar støddini á felagsins samlaðu tryggingarligu burturleggingum. Tað áliggur leiðslu tryggingarfelagsins at tryggja, at hesar ognir innan fyri tær avmarkingar, ið eru ásettar í § 70 og § 71 og sambært § 72, eru valdar soleiðis, at tær í mun til slagið av felagsins tryggingum viðvíkjandi trygd, vinningi og gjaldføri eru av slíkum slag og samanseting, at tær eru egnaðar at geva teimum tryggjaðu fulnað, heruppií at tað ikki er ósamsvarandi stórur bundinskapur av einum ávísum slagi av ognum, einum ávísum íløgumarknaði ella eini ávísari íløgu.

Stk. 2. Til nýtslu fyri ásetingunum í hesum kapitli verða uppgjørdar tær tryggingarligu burturleggingarnar eftir at drigin er frá endurtryggingarparturin, fluttar útveganarútreiðslur og tann parturin av teimum tryggingarligu burturleggingunum fyri óbeinleiðis tryggingar, ið samsvarar endurtryggingargoymslum hjá gevandi tryggingarfeløgum. Harumframt kann verða drigin frá upp til helvtina av útstandandi gjaldkomnum tryggingargjøldum.

Stk. 3. Virðið á ognunum verður gjørt upp til nýtslu fyri ásetingunum í hesum kapitli sambært hesum reglum:

1) Virðið á ognunum verður gjørt upp og javnað leypandi í samsvari við tær meginreglur, ið verða nýttar, tá felagið ger ársroknskap.

2) Frádragast skal fyri ein møguligan skuldarbundnan part, og útlán kunnu bert verða tikin við við einum virði, ið kemur fram, eftir at frádrignir eru mót rokniligar skyldur mótvegis lántakarum.

3) Hevur tryggingarfelagið gjørt fíggjarsáttmálar, ið minka vandan fyri, at ognirnar ikki rinda tær tryggingarligu skyldurnar, verður virðið á slíkum sáttmálum íroknað virðið á ognunum.

4) Útistandandi skuld, ikki gjaldkomnar rentur á virðisbrøvum, sum § 70, stk. 1, nr. 1-4, 6 og 7 fevnir um, verða íroknaðar virðinum á virðisbrøv unum.

§ 70. Til rindan av felagsins samlaðu tryggingarligu burturleggingum, jbr. § 69 kunnu hesar ognir verða nýttar:

1) lánsbrøv ella skuldarbrøv, sum stjórnir ella økismyndugleikar í øki A, jbr. fylgiskjal 1, hava givið út ella ábyrgjast fyri.

2) børsskrásett virðisbrøv, sum altjóða felagsskapir hava givið út, sum í minsta lagi hava ein lím, ið er limaland í Europeiska Samveldinum.

3) reallánsbrøv sambært § 1, stk. 4 í reallánslógini og onnur lánsbrøv givin út her í landinum ella í londum í øki A, ið hava eina samsvarandi trygd.

4) útistandandi skuld, ikki íroknað útistandandi skuld, ið er sett afturum aðrar ognarar, hjá láns stovnum undir almennum eftirliti í londum, sum øki A fevnir um, tó ikki lánsstovnum, sum nr. 3 fevnir um og lán, ið lánsstovnar ella tryggingar feløg ábyrgjast, ið eru undir almennum eftirliti í londum, sum øki A fevnir um.

5) grundøkir og bygningar, hvørs virði er óheft av eini serligari vinnunýtslu,

6) lán tryggjað við tinglýstum veðrætti í grundøkjum og bygningum, sum nr. 5 fevnir um, fyri eina upp hædd upp til tveir triðingar av ognarvirðinum, mett eftir reglum, sum Eftirlitið hevur ásett,

7) lán móti trygd í felagsins egnu lívstryggingarskjølum innan fyri teirra afturkeypsvirði,

8) lutir og prógv í íløgustovnum, ið kunngerð ráðsins 85/611/EØF fevnir um,

9) onnur lánsbrøv og lán skrásett á almennum virðisbrævabørsi í londum, ið øki A fevnir um,

10) partabrøv og aðrar fæfeingislutir, ið verða skrásettir á almennum virðisbrævabørsi í londum, ið øki A fevnir um,

11) grundøkir og bygningar, ið nr. 5 ikki fevnir um, og lán tryggjað við tinglýstum veðrætti í grund økjum og bygningum, ið nr. 6 ikki fevnir um,

12) fæfeingislutir og onnur virðisbrøv, ið eru skrásett á almennum virðisbrævabørsi í londum uttan fyri øki A, frá útgevarum, ið eru heimahoyrandi í londum uttan fyri øki A,

13) ikki skrásettir fæfeingislutir og onnur útlán og virðisbrøv, ið nr. 1-12 ikki fevna um.

Stk. 2. Um tryggingarfelagið hevur eitt dótturfelag, hvørs virksemi er avmarkað til at fremja og umsita íløgur, sum stk. 1 fevnir um, kunnu ognir dótturfelagsins innan fyri virðið á fæfeingislutunum í og møgulig lán til dótturfelagið verða viðgjørd sum ognir sambært stk. 1. Er dótturfelagið ikki full ogn, verða ognir less tiknar við, við einum lutfalsligum virði samsvarandi tí partinum av eginpeninginum, ið er øga.

Stk. 3. Um tryggingarfelagið hevur eitt dótturfelag, ið rekur beinleiðis lívstryggingarvirksemi við loyvi

sambært hesi lóg, kunnu ognir dótturfelagsins verða viðgjørdar sum ogn sambært stk. 1. Tann parturin av ogn dótturfelagsins, ið ikki gongur við til rindan av dótturfelagsins tryggingarligu burturleggingum og gjaldførisbredda, skal tá so er, vera av slíkum slag og samansetningi, at hann kann vera millum ognir móðurfelagsins til rindan av teimum tryggingarligu burturleggingunum eftir reglunum í hesum kapitli. Ognir dótturfelagsins kunnu tilsamans í mesta lagi ganga inn í tær ognir, ið rinda móðurfelagsins tryggingarligu burturleggingar, við einum virði, ið samsvarar virðinum á móðurfelagsins partabrevum í og nøgtuligum lánum til dótturfelagið við frádráttri av dótturfelagsins gjaldførisbredda. Er dótturfelagið ikki full ogn, verða ognir tess tiknar við við einum virði, ið samsvarar tí partinum av eginpeninginum, ið er ogn.

Stk. 4. Stk. 3 kann verða nýtt samsvarandi á onnur dótturfelag við loyvi sambært hesi lóg. Ognirnar hjá einum slíkum dótturfelag kunnu tó í mesta lagi roknast ognunum við einum virði, ið svarar til 5 prosent av móðurfelagsins tryggingarligu burturleggingum.

Stk. 5. Ognir, ið koma undir stk. 1, nr. 8-13, ið verða nýttar til rindan av teimum tryggingarligu burturleggingunum, kunnu í mesta lagi vera 40% av teimum tryggingarligu burturleggingunum, jbr. tó § 71, stk. 9 og 11.

Stk. 6. Ognir, ið koma undir stk. 1, nr. 12, ið verða nýttar til rindan av teimum tryggingarligu burturleggingunum, kunnu tilsamans í mesta lagi vera 10 prosent av teimum tryggingarligu burturleggingunum.

Stk. 7. Útlán, ið stk. 1, nr. 13 fevnir um, kunnu tilsamans í mesta lagi vera 2 prosent av teimum tryggingarligu burturleggingunum.

Stk. 8. Ognir, sum stk. 1, nr. 13, fevnir um, ið verða nýttar til rindan av teimum tryggingarligu burturleggingunum, kunnu í mesta lagi vera 10 prosent av teimum tryggingarligu burturleggingunum.

§ 71. Í felløgum, ið reka beinleiðis lívstryggingarvirksemi, kunnu ikki millum tær ognir, ið verða nýttar til rindan av tryggingarligum burturleggingum verða froknaðar ognir, ið umboða ein váða á eina einstaka fyritøku, hvørs virði tilsamans er meira enn 2 prosent av teimum tryggingarligu burturleggingunum. Í teimum førum, har viðkomandi fyritøka er heimahoyrandi og børsskrásett í einum landi, ið øki A fevnir um, og eginpeningurin hjá fyritøkuni fer upp um 250 mió. kr., er tað í 1.pkt. ásetta markið 3 prosent.

Stk. 2. Fyri onnur tryggingarfeløg enn tey í stk. 1 nevndu, er tað í stk. 1, 1. pkt. ásetta markið 4 prosent.

Stk. 3. Stk. 1 og 2 eru galdandi samsvarandi í mun til fyritøkur, ið hava eitt slíkt sínamillum sambond, at tær gera ein samlaðan váða fyri tryggingarfelagið.

Stk. 4. Fyri grundøkir og bygningar, sum § 70, stk. 1, nr. 5 fevnir um, og lán, sum § 70, stk. 1, nr. 6 fevnir um, verða stk. 1-3 at nýta samsvarandi við tí mun, at markið er 5 prosent.

Stk. 5. Um eitt tryggingarfelag hevur gjørt fløgur í ella veitt einum felag lán, hvørs ognir einans fevna um fløgur eftir § 70, stk. 1, nr. 5, verður tað í stk. 4 tilskilaða markið at nýta í tryggingarfelagsins samlaðu skyldur í felagnum.

Stk. 6. Stk. 1-3 verða at nýta samsvarandi á eitt dótturfelag hjá einum tryggingarfelag, sum hevur loyvi sambært hesi lóg, tá § 70, stk. 3 ella 4 ikki fevna um dótturfelagið, ella á eitt dótturfelag, ið § 6, stk. 3, fevnir um við tí mun, at markið er 5 prosent.

Stk. 7. Fyri ognir, sum § 70, stk. 1, nr. 3 fevnir um, er tað í stk. 1 og stk. 2 nevnda markið 40 prosent.

Stk. 8. Fyri váða á lánsstovnar undir almennum eftirliti í londum, sum øki A fevnir um, burtursað frá lánsstovnum, ið § 70, stk. 1, nr. 3 fevnir um, og á tryggingarfelog undir almennum eftirliti í londum, sum øki A fevnir um, er tað í stk. 1 og 2 nevnda markið 10 prosent. Ognir, ið § 70, stk. 1, nr. 4 ikki fevnir um, kunnu í mesta lagi verða froknaðar innan fyri tey mark, ið eru ásett í stk. 1 og stk. 2.

Stk. 9. Fyri lotir og prógv í einum einstøkum fløgustovni, sum tilskilað í § 70, stk. 1, nr. 8 er tað í stk. 1 og stk. 2 ásetta markið 10 prosent. Henda avmarking verður tó ikki at nýta, tá viðkomandi fløgustovnur sambært sínum viðtøkum einans kann gera fløgur í ognir, ið § 70, stk. 1, nr. 1-3 fevnir um. Í slíkum førum kann fløgan eisini í mun til ásetingarnar í § 70, stk. 5 koma undir § 70, nr. 1-3.

Stk. 10. Stk. 1-3 kunnu ikki verða nýtt á ognir, ið § 70, stk. 1, nr. 1, 2 og 7 fevnir um.

Stk. 11. Stk. 1-3 og 5 kunnu ikki verða nýtt á fløgur í dótturfeløgum, ið § 70, stk. 2, 3 ella 4 fevnir um, og á fløgur í felløgum, hvørs virksemi sambært tess viðtøkum er avmarkað til at gera fløgur í ognir, ið § 70, stk. 1, nr. 1-3 fevnir um. Í síðst nevnda fari kunnu fløgur í mun til ásetingarnar í § 70, stk. 5, 7 og 8 koma undir § 70, stk. 1, nr. 1-3.

§ 72. Eftirlitið ásetir reglur um, hvussu ognirnar eftir § 70, stk. 1 skulu verða flagdar við atliti til einshattan og staðarbinding í mun til tey gjaldoyru og tey lond, í hvørjum tær tryggingarligu skyldurnar skulu greiðast.

§ 73. Fyri burturleggingar fyri tryggingar, ið eru knýttar at fløgugrunnum, verða § 69, stk. 1, 2. pkt. § 70,

stk. 2-8, og § 71 ikki at nýta, í tann mun felagið ikki áleggur sær nakran fløguváða.

Stk. 2. Fyri tryggingar, ið stk. 1 fevnir um, kann Eftirlitið ásetta nærri reglur um rindan av teimum tryggingarligu burturleggingunum.

§ 74. Í lívstryggingarfeløgum skal verða førd ein skrá yvir ognirnar sambæt § 70, stk. 1 og fíggjarsátmálum sambæt § 69, stk. 3, nr. 3. Tær skrásetta ognirnar eru einans ætlaðar til at geva teim tryggjaðu fulnað.

Stk. 2. Tá roknskaparárið endar, ger ábyrgdarhavandi tryggingarfrøðingurin tær tryggingarligu burturleggingarnar upp. Lívstryggingarfelagið hevur eftir hetta 3 mánaðar freist at skrásetta tær ognir, ið eru neyðugar til at rinda tryggingarligu burturleggingarnar. Í roknskaparárinum skal felagið fremja skráseting til rindan av teirri upphædd, ið metur at tryggingarligu burturleggingarnar eru vaksnar við í farna partinum av roknskaparárinum.

Stk. 3. Kravið um skráseting er ikki galdandi fyri tey í § 70, stk. 1, nr. 7 nevndu tryggingarskjalslán

Stk. 4. Tann løggildi grannskoðarin hevur skyldu til at ansa eftir, at stk. 2, 2. og 3. pkt. verða hildin.

Stk. 5. Er føst ogn millum ognirnar, verður tinglýst veðbrev skrásett.

Stk. 6. Hevur lívstryggingarfelagið eitt dóturfelag, ið § 70, stk. 2, 3 ella 4 fevnir um, verða ognirnar hjá dóturfelagnum ella ognarpartar í og møgulig lán til dóturfelagið skrásett.

Stk. 7. Lívstryggingarfeløg geva fráboðan til Eftirlitið um, hvørjar ognir eru skrásettar sambæt stk. 2, 2.og 3. pkt. Eftirlitið, ella hann, sum Eftirlitið heimilar til tess, ansar eftir, at hesar ognir eru til staðar, sambæt nærri reglum, sum Eftirlitið hevur ásett.

Stk. 8. Eftirlitið ásetir nærri reglur um fráboðanar- og skrásetingarskyldunna hjá lívstryggingarfeløgunum.

Stk. 9. Eftirlitið kann krevja, at skrán verður sett í varðveitslu, um Eftirlitið ger av at avmarka ella banna felagnum ræði yvir ognum tess. Í samband við varðveitsluna av skránni skal Eftirlitið verða skrásett sum heimlað í Værdipapircentralen viðvíkjandi viðlisbrevognum. Viðvíkjandi hinum ognunum, ið eru ætlaðar til rindan av teimum tryggingarligu burturleggingunum, skulu hesar handveðsetast til fruma fyri Eftirlitið.

Stk. 10. So leingi skrán er í varðveitslu, skal ein og hvørt broyting góðkennast av Eftirlitinum og skrásetast í skránni.

§ 75. Eftirlitið kann gera frávik frá reglunum í hesum kapitli.

Kapittul 13
Vinningsbýti, trygdargrunnur v.m.

§ 76. Sum vinningsbýti til partaeigarar, renta til ábyrgdarar ella útgjald til limir í sínámillum tryggingarfeløgum kann einans verða nýtt ársins úrslit (yvirskot) sambæt tí góðkenda ársroknskapinum fyri seinasta roknskaparár, flutt yvirskot frá árum frammanundan og annar tiltakspeningur, ið ikki er bundin sambæt lóg ella viðtøkum felagsins, eftir at frádrigið er fyri ein part undirskot, ið ikki er rindað, fyri ein part uppheddir, ið sambæt lóg ella viðtøkum felagsins skulu burturleggjast í ein trygdargrunn ella til onnur endamál.

§ 77. So leingi felagsins grundarfæfeingi ikki utan iva fylkir krovini í §§ 25 og 27, kann vinningsbýti ikki verða latið partaeigarunum, renta ikki verða latin ábyrgdarunum, ella peningur latin limunum í sínámillum feløgum.

§ 78. Í tryggingarpartafeløgum kann útbýtan annars av ognum felagsins annars einans verða gjørd sum útlutan í sambandi við niðurseran av partapeninginum ella avtoku av felagnum. Í sínámillum feløgum kann útbýtan annars til limirnar einans verða gjørd í samsvari við tær í viðtøkunum ásettu reglur.

Stk. 2. Vinningsbýti til partaeigarar, renta til ábyrgdarar ella útgjalding til limirnar í sínámillum feløgum kann ikki fara upp um tað, sum má roknast ráðligt við atliti til felagsins og, í móðurfeløgum, samtøkunnar fíggjarligu støðu.

§ 79. Eitt tryggingarfelag kann, um viðtøkurnar hava reglur um hetta, gera burturleggingar í ein trygdargrunn.

Stk. 2. Peningur, ið er burturlagdur í trygdargrunnin, kann ikki verða tikin úr hesum. Heldur ikki kunnu broytingar verða gjørdar í viðtøkunum við teirri avleiðing, at peningur, ið sambæt stk. 1 longu er burturlagdur í trygdargrunnin, kann verða tikin úr hesum. Peningur trygdargrunnsins kann tó eftir loyvi frá Eftir-

litinum verða nýttur til at rindan av tapi í samband við, at tryggingarligar skyldur verða greiddar, ella á annan hátt til frama fyri tey tryggjaðu.

§ 80. Ásetingarnar í § 115, stk. 1 í partafelagslógini kunnu ikki verða nýttar til atgerðir, sum eru vanligar og vinnuliga grundaðar. Tílíkar atgerðir krevja tó loyvi frá Eftirlitinum, tá tær viðvíkja einum móðurfelag, uttan mun til um hetta er eitt tryggingarfelag, ið henda lóg fevnir um, ella viðvíkja einum felag, sum tryggingarfelagið annars er í samtøkufelagsskapi við.

Stk. 2. § 115, stk. 1 og 2 í partafelagslógini eru ikki galdandi fyri eitt lán, sum eitt lívstryggingarfelag hevur veitt innan fyri afturkeypsvirðið móti veð í tryggingarskjalinum.

§ 81. Tryggingarfeløg og teirra dóttarfeløg kunnu einans veita lán til ella veita trygd fyri einum móðurfelag, tá móðurfelagið er eitt tryggingarfelag, ið henda lóg fevnir um ella ein peningastovnur, sum lóg um bankar og sparikassar v.m. fevnir um, og einans við loyvi Eftirlitsins.

Stk. 2. Eftirlitið kann í serstøkum førum geva loyvi til, at eitt tryggingarfelag og tess dóttarfeløg veita lán til ella seta trygd fyri einum móðurfelag, um viðurskiftini millum tryggingarfelagið og móðurfelagið eru sum ásett í § 3, stk. 2, nr. 2.

§ 82. Eitt tryggingarfelag kann annars ikki uttan loyvi frá Eftirlitinum veita lán til ella seta trygd fyri fyritøkur ella persónar, sum beinleiðis ella óbeinleiðis hava eina avgerandi ávirkan á felagið, ella sum fyritøkur og persónar við eini slíkari ávirkan ráða yvir. Sama er galdandi fyri peningafløgu hjá einum tryggingarfelag í slíkar fyritøkur.

Stk. 2. Um so er, at Eftirlitið skrivliga fráboðar einum tryggingarfelag, at loyvi sambært stk. 1 er neyðugt, kann tiltakið ikki verða framt, fyrr enn avgerð Eftirlitsins er broytt. Tað áliggur felagnum at prógva, at tiltakið lógliga hevur kunna verið framt.

Stk. 3. Um eitt tryggingarfelag er móðurfelag, sum tilskilað í § 1, stk. 2, nr. 6 í ársroknskaparlógini, verða stk. 1 og 2 eisini at nýta fyri samtøkuna. Nevnd og stjórn tryggingarfelagsins ansa eftir, at hetta verður hildið.

Stk. 4. § 115, stk. 3-5 í partafelagslógini verða at nýta samsvarandi á atgerðir, framdar ímóti stk. 1 og 3.

Kapittul 14
Umsiting av eini lívstryggingarmongd

§ 83. Verður mongdin av lívstryggingum hjá einum tryggingarfelag tikin undir umsiting sambært § 172 ella § 175, skal loyvi hjá felagnum verða tikið aftur. Avgerðirnar skulu skrásetast hjá tí føroyska skrásetingarmyndugleikanum.

Stk. 2. Eftirlitið skal taka ræði yvir øllum virðishrøvum, ið eru skrásett til rindan av lívstryggingarburturleggingunum, jbr. § 74. Allar hesar ognir skulu gera eina serstaka mongd, ið einans er ætlað at nýta til rindan av krøvum hjá teimum tryggjaðu.

Stk. 3. Verður eitt lívstryggingarfelag koyrt á húsagang, sendir skiftiraetturin beinanvegin tær í stk. 2 nevndu ognirnar til Eftirlitið.

Stk. 4. Tey einstøku tryggjaðu kunnu ikki gera krøv galdandi mótvegis felagnum. Harafturímóti kann Eftirlitið umsitingarbúsins vegna krevja tað, sum eftir metingini av teimum móttiknu ognunum, jbr. § 86, stk. 1, írestar, fyri at lívstryggingarburturleggingarnar og fráboðaði og fallin tryggingarkrøv sambært útrokningini nevnd í § 86, stk. 2, verða rindað. Harumframt kann Eftirlitið umsitingarbúsins vegna krevja tað, ið samsvarar tí grundarliefeingt, ið samsvarar við tann fyri felagið útroknaða gjaldførisbredda, ið er varðveittur sambært eini fíggjarstøðu, sum er gjørd upp tá umsitingarbúgvið byrjaði, og gjørdur upp í samsvari við § 25, jbr. § 27.

Stk. 5. Verður eitt lívstryggingarfelag koyrt á húsagang eftir at umsitingin er byrjað, fær húsagangurin onga avleiðing fyri umsitingarbúgvið.

§ 84. Eftirlitið skal umsita tær frá felagnum móttiknu ognirnar og kann hjá felagnum, møguliga við hitans hjálp, krevja allar til umsitingina neyðugu bøkur og skjøl útflýggjað.

Stk. 2. Eftir at ummæli er fingið frá Eftirlitinum kann Føroya Landsstýri tilnevna umsitarar til Eftirlitsins vegna at standa fyri umsitingini av teimum ognunum, sum eru móttiknar.

Stk. 3. Samsýning til umsitarar og aðrar útreiðslur verða goldnar í samband við umsitingina av umsiting-

arbúnum. Eftirlitið ásetir støddina á samsýningini.

§ 85. Tá tryggingarmongdin er tikin undir umsiting, kunnu teknaðar tryggingar ikki verða afturkeyptar. Tá kann afturkeypsvirði heilt ella fyri ein part verða nýtt til rindan av teimum í § 70, stk. 1, nr. 5 nevndu tryggingarskjalslánum.

Stk. 2. Tryggingarkrøv, sum áðrenn umsitingin byrjaði vóru fallin til gjaldingar ella fráboðaði, skulu verða gjørd av sambært teimum áðrenn hetta mundið galdandi reglum. Tryggingar, sum falla til gjaldingar seinri, skulu fyribils einans verða útgoldnar við eini so stórari upphædd, sum Eftirlitið eftir umstøðunum metir ráðiligt. Vísir endaliga ásetingin av tryggingarupphæddunum, at tað á henda hátt er útgoldið ov nógv, kann afturgjalding ikki verða kravd.

§ 86. So skjótt Eftirlitið hevur tikið við teimum í § 83, stk. 2 umrøddu ognum, skal tað lata tær meta í samsvari við galdandi virðisásetingarreglur.

Stk. 2. Samstundis skal Eftirlitið rokna út lívstryggingarburturleggingarnar og gera upp støddina á fráboðaðum krøvum, ið fallin eru til gjaldingar sambært tryggingaravtalunum, tá umsitingin byrjaði. Eftirlitið kann tó, um tað verður mett neyðugt, áseta eitt annað grundarlag fyri útrokningini av lívstryggingarburturleggingunum enn tað útrokningargrundarlag, ið var galdandi fyri felagið, tá umsitingin byrjaði.

§ 87. Eftirlitið skal skjótast gjørligt eftir at meting og útrokning sambært § 86 er gjørd, royna at fáa alla tryggingarmongdina yvirtikna av einum ella fleiri lívstryggingarfeløgum, ið reka virksemi her í landinum. Kemur eitt tilboð um slíka yvirtøku, skal Eftirlitið, um tað metir at tikið kann verða við tilboðnutu, gera eina frágreiðing um støðuna og eitt uppskot til sáttmála við viðkomandi felag. Hevur sáttmálin við sær uiðursetan av tryggingarupphæddunum ella broyting í tryggingartreytunum, heruppií reglunum um eykaágóða skal hetta verða tilskilað.

Stk. 2. Frágreiðingin og uppskotið skulu kunngerast í tí í Føroyum til almennar lýsingar góðkenda blað, og í dagbløðum. Frágreiðingin skal hava eina áheitan á tryggingartakarnar um innan eina freist, sum Eftirlitið ásetir, ið ikki kann vera styttri enn ein mánað, skrivliga at boða Eftirlitinum frá, um teir mótmæla avhendingini. Felagið skal samstundis til teir tryggingartakarar, hvørs bústaður er felagnum kunnugur, senda frágreiðingina og uppskotið.

Stk. 3. Tá tann í stk. 2 nevnda freist er úti, tekur Eftirlitið við fyriliti til tey innkomnu mótmælini avgerð um tryggingarmongdin skal avhendast í samsvari við framsetta uppskotið. Tryggingaravtalan kann ikki verða slitin við avhendingini sum grundgeving.

Stk. 4. Er avhendingin hend á annan hátt, at ikki allar ognirnar hjá umsitingarbúnum eru farnar við, skal Eftirlitið lata felagnum ella búgvi tess yvirskotið.

§ 88. Kann tryggingarmongdin ikki verða avhendað sambært § 87, skal Eftirlitið gera tá endaligu ásetingina av tryggingarupphæddunum sambært teirri gjørdu uppgerðini og boða tryggingartakarnar saman til aðalfundar til stovnan av einum sínámillum tryggingarfelag. Til henda aðalfund verður givin ein 2 mánaða freist. Boðanin og frágreiðing um støðuna og tann av Eftirlitinum útroknaða áseting av tryggingarupphæddunum verður kunngjørd á tann í § 87, stk. 2 tilskilaða hátt. Uppskot til tær viðtøkur og tað grundarlag, sambært hvørjum tað nýggja felagið skal reka virksemi sítt, verður lagt fram til eftirskoðan á skrivstovu Eftirlitsins. Uppskot til viðtøkur verður eftir áheitan útflýggjað frá skrivstovu Eftirlitsins ella á annan hátt, sum Eftirlitið metir hóskandi.

Stk. 2. Ásetingarnar í § 13 og § 26, jbr. § 3, §§ 5-9 og § 176 í partafelagslógini kunnu ikki verða nýttar tá sínámillum feløg sambært stk. 1 verða stovnað. Um onnur enn tryggingartakarnir kunnu tekna ábyrgdarpartar, verður eisini § 26, jbr. § 7 og § 8, stk. 1 í partafelagslógini, at nýta. Í ti fori kemur tann í stk. 1, 3. pkt. nevnda frágreiðing í staðin fyri tekningarlistan, og Eftirlitið fremur tær heimildir, ið sambært § 26, jbr § 8, stk. 1 í partafelagslógini, eru lagdar til stovnarnar.

Stk. 3. Við skrásetingini kemur tað sínámillum felagið í tann í § 83, stk. 4 nevnda rætna mótvegis tí fyrra felagnum.

Stk. 4. Kann eitt nýtt felag ikki verða stovnað, heldur umsitingin fram og Eftirlitið tekur stoðu til, um fleiri royndir skulu verða gjørdar at føra tryggingartakarnar til eitt nýtt ella til eitt annað felag.

Kapittul 15
Avheading av eini lívstryggingarmongd

§ 89. Vil eitt felag avhenda alla sína lívstryggingarmongd ella ein ávísan part av hesi til eitt annað felag, soleiðis at fyrst nevnda felag við hesum verður leyst av ábyrgd mótvegis tryggingartakarunum, skal tað søkja Eftirlitið um loyvi til hetta, um ikki tryggingarfelagið í samband við yvirtøkuna fær samtykki frá tí einstaka tryggingartakaranum. Við umsóknini um avhendingina skal fylgja tann sáttmáli, ið er gjørdur millum tey tvey feløgini, og slíkar upplýsingar um tey bæði feløgini, sum Eftirlitið metir neyðugar fyri at kunna meta, um avhendingin er ráðilig mótvegis tryggingartakarunum.

Stk. 2. Í samband við avhendingina kunnu í tryggingartreytunum hjá avhendandi felagnum einans verða gjørdar slíkar broytingar, ið Eftirlitið metir verða eina neyðuga fylgju av avhendingini, heruppí broyting í reglunum um eykaágóða.

Stk. 3. Um ikki Eftirlitið á verandi grundarlag metir, at loyvi til avhendingina eigur at verða noktað, skal Eftirlitið kunngera eina frágreiðing um ta ætlaðu avhendingina í tí í Føroyum til almennar lýsingar góðkenda blað og í dagbløðum. Frágreiðingin skal hava eina áheitan á teir tryggingartakarar, hvørs tryggingar ætlanin er at avhenda, um innan 3 mánaðir at geva Eftirlitinum skrivliga fráboðan, um teir mótmæla avhendingini. Felagið skal samstundis senda teimum tryggingartakarum, hvørs bústaður er felagnum kunnugur, eina fráboðan um avhendingina og frágreiðing Eftirlitsins.

Stk. 4. Tá tann í stk. 3 nevnda freist er úti, tekur Eftirlitið við fyriliti til tey innkomnu mótmælini avgerð, um tryggingarmongdin kann verða avhendað í samsvari við framsetta uppskotið. Tryggingaravtalan kann ikki verða slitin við avhendingini sum grundgeving.

§ 90. Verður avgjørt at smelta saman tvey ella fleiri lívstryggingarfeløg til eitt nýtt felag sambært § 93, stk. 1, hevur avgerðin um hetta ikki gildi fyrr enn Eftirlitið í samsvari við § 89 hevur givið loyvi til ta í sambandi við samansmeltingina neyðugu avhendingina av tryggingarmongdini.

Stk. 2. Tá Eftirlitið hevur tikið avgerð um, at tryggingarmongdin kann verða avhendað, jbr. § 89, stk. 4, kunnu tryggingartakarnir ikki slíta tryggingaravtaluna, hóast § 27 í lóg um tryggingaravtalur, við samansmeltingini sum grundgeving.

Stk. 3. Vil eitt tryggingarfelag avhenda alla sína ogn og skuld til eitt annað tryggingarfelag, sambært § 93, stk. 1, verða stk. 1 og 2 at nýta samsvarandi.

Kapittul 16
Avhending av eini skaðatryggingarmongd

§ 91. Vil eitt tryggingarfelag avhenda alla sína skaðatryggingarmongd ella ein ávísan part av hesi til eitt annað felag, soleiðis at fyrst nevnda felagið við hesum verður leyst av ábyrgd mótvegis tryggingartakarunum, skal tað søkja Eftirlitið um loyvi til hetta, um ikki tryggingarfelagið í samband við avhendingina fær samtykki frá tí einstaka tryggingartakaranum. Við umsóknini um yvirtøkuna skal fylgja tann sáttmáli, ið er gjørdur millum tey bæði feløgini og slíkar upplýsingar um tey bæði feløgini, ið Eftirlitið metir neyðugar fyri at kunna meta, um avhendingin er ráðilig mótvegis tryggingartakarunum.

Stk. 2. Um ikki Eftirlitið á verandi grundarlag metir, at loyvi til avhendingina eigur at verða noktað, skal Eftirlitið kunngera eina frágreiðing um ta ætlaðu avhendingina í tí í Føroyum til almennar lýsingar góðkenda blað og í dagbløðum. Frágreiðingin skal hava eina áheitan á teir tryggingartakarar, hvørs tryggingar ætlanin er at avhenda, um innan 3 mánaðir at geva Eftirlitinum eina skrivliga fráboðan, um teir mótmæla avhendingini. Felagið skal samstundis senda teimum tryggingartakarum, hvørs bústaður er felagnum kunnugur, eina fráboðan um avhendingina og frágreiðing Eftirlitsins.

Stk. 3. Tá tann í stk. 2 nevnda freist er úti, tekur Eftirlitið við fyriliti til tey innkomnu mótmælini avgerð, um tryggingarmongdin skal verða avhendað í samsvari við framsetta uppskotið. Tryggingaravtalan kann ikki verða slitin við avhendingini sum grundgeving.

§ 92. Verður avgjørt at smelta saman tvey ella fleiri skaðatryggingarfeløg til eitt nýtt felag sambært § 93, stk. 1 hevur avgerðin um hetta ikki gildi, fyrr enn Eftirlitið í samsvari við § 91 hevur givið loyvi til ta í sambandi við samansmeltingina neyðugu avhendingina at tryggingarmongdini.

Stk. 2. Tá Eftirlitið hevur tikið avgerð um, at tryggingarmongdin kann verða avhendað, jbr. § 91, stk. 3, kunnu tryggingartakarnir ikki slíta tryggingaravtaluna, hóast § 27 í lóg um tryggingaravtalur, við saman-

smeltingini sum grundgeving.

Stk. 3. Vil eitt tryggingarfelag avhenda alla sína ogn og skuld til eitt annað tryggingarfelag sambæt § 93, stk. 1, verða stk. 1 og 2 at nýta samsvarandi.

Kapittul 17
Samanlegging og klúgving

§ 93. Reglurnar um samanlegging í hesum kapitli verða at nýta, tá eitt tryggingarfelag uttan at verða avtikið verður upployst við avhending av allari ogn og skuld hjá felagnum til eitt annað tryggingarfelag, og tá tvey ella fleiri tryggingarfeløg verða smeltað saman til eitt nýtt tryggingarfelag.

Stk. 2. Reglurnar verða at nýta samsvarandi, um so er, at eitt parta- ella smúpartafelag, hvørs endamál einans er at reka virksemi, ið § 6 fevnir um, stk. 1, uttan at verða tikið av avhendan alla sína ogn og skuld til eitt annað tryggingarfelag.

Stk. 3. Reglurnar verða við neydugum tillagingum at nýta samsvarandi, tá tað í einum tryggingarfelag verður tikin avgerð um klúgving av felagnum.

§ 94. Hóast reglurnar í § 134 b, stk. 2, 3. pkt. í partafelagslógini, kann Eftirlitið tó loyva, at tær roknskaparligu upplýsingarnar í seinastu ársfíggjarstøðum í hvørjum av teimum samanløgdu felløgunum verða lagdar til grund fyri metingini av teimum tryggingarligu burðurleggingunum, og at samanleggingin verður framd við roknskaparligum gildi frá framløgudegnum fyri seinastu ársfíggjarstøðu í teimum samanløgdu felløgunum.

§ 95. Í seinasta lagi ein mánað eftir, at samanleggingaraetlanin er undirskrivað, verður fyri hvørt av teimum samanløgdu felløgunum sent eitt av nevndini váttað makaskjal av samanleggingaraetlanini til Eftirlitið. Eisini skal váttanin hjá metingarmonnunum sambæt § 134 c í partafelagslógini verða send Eftirlitinum.

Stk. 2. Móttøkan av skjølunum í stk. 1, verður kunngjørd sambæt § 168.

§ 96. Avgerð um samanlegging skal í einum framhaldandi sínámillum tryggingarfelag verða tikin á aðalfundi, um ábyrgdarar, fimir ella umboð fyri hesar, ið eru 1/10 av teimum, ið hava atkvøðurætt ella tann minni brotspartur, sum viðtøkurnar munnu ásetta, jbr. § 48, innan 14 dagar eftir kunngeringina av samanleggingaraetlanini sambæt § 168 skrivliga krevja, at avgerðin verður tikin av aðalfundinum. Um so er, verður avgerðin tikin við tí í § 56, stk. 1 ásetta meirilutan, § 134 e, stk. 2 og 3 í partafelagslógini, koma ikki í nýtslu.

§ 97. Í seinasta lagi samstundis við fráboðanini um avgerðina um samanlegging sambæt § 134 e í partafelagslógini, skal felagið søkja Eftirlitið um loyvi sambæt § 90 ella § 92. Við umsókninni skulu fylgja tey í § 134 e, stk. 5, nr. 3 og 4 í partafelagslógini nevndu skjøl í frumriti ella eitt av nevndini váttað makaskjal.

Stk. 2. Avgerð sambæt § 96 og § 134 e, stk. 1-3 í partafelagslógini, hevur ikki gildi fyrr enn:

1) Eftirlitið hevur váttað, at ognarar felaganna, ið ikki eru tryggingartakarar, eftir avhendingina ella samansmeltingina eru nóg vel tryggjaðir, og

2) loyvi Eftirlitsins sambæt § 90 ella § 92 er til skjals.

Stk. 3. Samstundis við loyvinum, tekur Eftirlitið loyvið aftur frá uppathaldandi felagnum við gildi frá einum degi, sum Eftirlitið hevur ásett.

§ 98. Eitt uppathaldandi felag verður mett upployst, og tess rettindi og skyldur í síni heild at verða farnar til tað framhaldandi felagið, tá treytirnar í § 134 h, stk. 1, nr. 1 og 2 í partafelagslógini eru loknar, og ein góðkenning frá Eftirlitinum sambæt § 97, stk. 2 er til skjals.

Stk. 2. § 134 e, stk. 6, § 134 f, § 134 g og § 134 h, stk. 1, nr. 3 í partafelagslógini, kunnu ikki verða nýttar til tryggingarfeløg.

Kapittul 18
Avtøka av tryggingarfelagum

§ 99. Í sínámillum tryggingarfeløgum tekur aðalfundurin avgerð um uppløsing av felagnum í samsvari við

reglurnar í § 55 og § 56, stk. 1 í hesi lóg.

§100. Eitt tryggingarfelag, ið hevur avhendað alla sína tryggingarmongd til eitt annað felag sambært reglunum í kapitli 15 ella 16, skal avtakast sum tryggingarfelag. Fer avtøkan fram á annan hátt enn við samanlegging sambært § 134 j, stk. 1 ella 134 k í partafelagslógini, við avtøku ella húsagangi, skal avtøkunnar formur, innihald og fremjing góðkennast av Eftirlitinum.

Stk. 2. Verður eitt tryggingarfelag umskapað sambært stk. 1, 2. pkt. fær tað yvirtakandi tryggingarfelagið skyldurnar og rættindini hjá avhendandi tryggingarfelagnum uttan skuldaraskifti.

§ 101. Eitt felag, ið rekur lívstryggingarvirksemi, kann ikki uttan samtykki frá hvørjum einstøkum tryggingartakara verða upploystur, um ikki tað frammanundan hevur flutt alla sína tryggingarmongd til eitt annað felag í samsvari við tær í § 89 ásettu reglur, ella tess tryggingarmongd er tikin undir umsiting.

§ 102. Talar fyrilitið fyri teimum tryggjaðu, partaeigarum, ábyrgdarum ella ognarum fyri, kann Føroya Landsstýri, eftir at ummæli er fingið frá Eftirlitinum, tilnevna ein avtøkustjóra til saman við teimum, sum aðalfundurin hevur valt at fremja avtøkuna.

Stk. 2. Tekur Eftirlitið sambært § 172 ella § 173 avgerð um, at eitt felag skal fara í avtøku, tilnevnir skiftiraetturin eftir samráðing við Eftirlitið ein ella fleiri avtøkustjórar, av hvørjum ein skal vera løgfrøðingur. Eftirlitið kann fyribils seta úr gildi viðtøkur felagsins meðan avtøkan fer fram. Avtøkan verður mett byrjað, tá Eftirlitið tekur avgerð um at felagið skal fara í avtøku.

§ 103. Reglurnar í hesi lóg um rokuskaparframbøgu, grannskoðan, aðalfundir og um innsendan av rokuskapum til Eftirlitið verða at nýta í feløgum í avtøku við teimum frávikum, ið fylgja av niðanfyri standandi reglum og § 121, stk. 1 og 2 og §§ 122-125 í partafelagslógini.

§ 104. Tær í § 122 í partafelagslógini nevndu úrslitauppgerðir og frágreiðingar verða sendar í tveimum eintøkum til Eftirlitið, ið letur tí føroyska skrásetingarmyndugleikanum tað eina.

§ 105. Verður felagið sambært § 27, stk. 2 í lóg um tryggingaravtalur biðið um at seta trygd fyri, at tað lýkur sínar skyldur, ger Eftirlitið av, um ein boðin trygd má verða mett at vera tryggjandi.

§ 106. Áheitan vegna eitt tryggingarfelag um trotabúarviðgerð kann bert nevndin ella, um felagið er í avtøku, avtøkustjórin, lata inn.

Stk. 2. Er felagið í avtøku og metir avtøkustjórin, at avtøkan ikki fer at geva heilan fulnað til ognararnar og tryggingartakararnar, skal hann kalla til aðalfundar at taka avgerð um innlatan av áheitan um trotabúarviðgerð.

Stk. 3. Verður eitt tryggingarfelag úgjaldført, skal Eftirlitið lata inn áheitan um trotabúarviðgerð til skiftirættin, um ikki onnur hava latið inn slíka áheitan.

Stk. 4. Verður eitt tryggingarfelag, ið rekur annað tryggingarvirksemi enn lívstryggingarvirksemi koyrt á húsagang, verður § 176 at nýta samsvarandi.

Stk. 5. Verður eitt lívstryggingarfelag koyrt á húsagang, skal Eftirlitið taka tryggingarmongdina undir umsiting sambært kapittul 14 í hesi lóg.

Stk. 6. Avgerð Eftirlitsins um at lata inn áheitan um trotabúarviðgerð sambært stk. 3 kann ikki verða kærd sambært § 170.

§ 107. Verður eitt tryggingarfelag tikið til trotabúarviðgerð gevur skiftiraetturin føroyska skrásetingarmyndugleikanum og Eftirlitinum fráboðan um, nær trotabúarviðgerðin byrjar, og nær hon endar.

Stk. 2. Eftir at lítarettaravgerð er tikin um trotabúarviðgerð tilnevnir skiftiraetturin eftir samráðing við Eftirlitið ein ella fleiri bústjórar.

Stk. 3. Eftirlitið hevur rætt til at luttaka á fundum í ognaranevnd og í skiftifundum. Uppskot til rokuskap og útbýtan í trotabúnum skal sendast Eftirlitinum.

Stk. 4. Eitt tryggingarfelag, ið er í húsagangi, skal varðveita navn sítt við uppískoytinum "á húsagangi".

Stk. 5. Í sambond við skráseting av, at húsagangurin er endaður, verður felagið strikað hjá tí føroyska skrásetingarmyndugleikanum.

Stk. 6. Reglurnar um neyðskuldarsemju í konkurslógini kunnu ikki verða nýttar til tryggingarfelóg.

§ 108. Føroya Landsstýri kann gera av, at avtøkustjórin ella bústjórin fyri rokning búsins skal geva tryggingartakarunum boð um, at felagið er avtikið og um fylgjurnar av hesum.

Stk. 2. Føroya Landsstýri kann ásetu nærri reglur um form og innihald á frábodanini.

Kapittul 19
Grannskoðan og granskan

§ 109. Aðalfundurin velur tveir ella fleiri grannskoðarar í samsvari við viðtøkurnar. Grannskoðararnir verða valdir antin fyri eitt ávíst áramál ella í óavmarkaða tíð. Aðalfundurin kann velja varðannum fyri hesar. Viðtøkurnar kunnu geva almennum myndugleikum ella øðrum rætt at tilnevna ein ella fleiri grannskoðarar afturat.

Stk. 2. Tá partaeigari, ið eigur ein tíggjundapart av partapeningínum ella í sínámillum feløgum tá ein tíggjundapartur av øllum, sum hava atkvøðurætt á einum aðalfundi, hur val av grannskoðara er á fundarskránni, atkvøða fyri tí, skal nevndin biðja Eftirlitið tilnevna ein grannskoðara til saman við hinum grannskoðarunum at taka lut í grannskoðanini fyri tíðina til og við næsta vanliga aðalfundi. Um tilnevningina skal tað uttan gjald verða gjørd viðmerking hjá tí føroyska skrásetingarmyndugleikanum og kunngering í tí í Føroyum til almennar lýsingar góðkenda blað. Letur nevndin ikki Eftirlitinum áheitanina, kann ein og hvør partaeigari ella sum hevur atkvøðurætt seta fram áheitanina. Eftirlitið ásetir samsýningina til tann tilnevnda grannskoðaran.

§ 110. Uppgávur, ið sambæri partafelagslógini kunnu verða røktar av einum einstøkum grannskoðara, skulu í tryggingarfelløgum allir grannskoðararnir røkja.

§ 111. Grannskoðararnir skulu vera myndugir. Í minsta lagi ein av grannskoðarunum skal hava bústað í Føroyum.

Stk. 2. Í minsta lagi ein av grannskoðarunum skal vera løggildur.

Stk. 3. Verður eitt grannskoðarafelag valt til grannskoðara, skal hann, sum grannskoðanin verður latin upp í hendi, lúka treytirnar ásettar í stk. 1, 2, 4 og 5 og § 112.

Stk. 4. Lóggávunnar reglur um grannskoðan og um gegnt hjá grannskoðarum eru eisini galdandi fyri grannskoðarar, ið ikki eru løggildir ella skrásettir.

Stk. 5. Hoyrir tryggingarfelagið til eina samtoku, skal tann løggildi grannskoðarin vera felags fyri samtøkuna. Fyri ein bólk av feløgum, sum Eftirlitið tekur avgerð fyri sambæri § 3, stk. 2, kann Eftirlitið gera av, at í minsta lagi 2 grannskoðarar, av hvørjum ein skal vera løggildur, skal vera felags fyri bólkin.

§ 112. Til grannskoðara í einum dóttarfelag kann ikki nakar persónur verða valdur, ið vegna ógegni ikki kann verða valdur til grannskoðara í móðurfelagnum.

Stk. 2. Eitt felag ella felløg innan sama samtøku kunnu ikki veita lán ella seta trygd fyri ein grannskoðara. Hetta er tó ikki galdandi fyri lán veitt innanfyri afturkeypsvirðið á einum tryggingarskjali, sum eitt lívstryggingarfelag hevur givið út.

§ 113. Starv grannskoðarans skal halda uppat við endan av vanliga aðalfundinum, ið verður hildin við eftir at síðsta roknskapartíðin er úti, sum hann er valdur fyri, ella um grannskoðarin er valdur fyri óavmarkaða tíð, tá ein annar grannskoðari er valdur í hansara stað.

Stk. 2. Ein grannskoðari kann tit eina og hvørja tíð fara úr starvi sínum, og kann verða koyrdur úr starvi við avgerð hjá tí, sum hevur valt hann.

Stk. 3. Verður ein grannskoðari mettur greiðt óegnaður til sítt starv, kann Føroya Landsstýri koyra viðkomandi frá, og í staðin fyri tann fráfarandi tilnevna ein grannskoðara, ið virkar til nýtt val kann fara fram.

Stk. 4. Í tryggingarfelløgum, hvørs partabrøv ella lánsbrøv verða virðisskrásett alment, skal tað innan 8 dagar eftir, at grannskoðarin hevur givið frábodan um sína fráfaring, verða kallað saman til eykaaðalfundar, har ein nýggjur grannskoðari skal verða valdur.

Stk. 5. Ileldur starvið hjá einum grannskoðara uppat, áðrenn valskeiðið endar, ella fýkur hann ikki longur treytirnar fyri at vera grannskoðari, og er ongin varamaður at koma í hansara stað, ábiggur tað nevndini sum skjótast at fáa í lag val av nýggjum grannskoðara.

Stk. 6. Við grannskoðaraskifti skal tryggingarfelagið og grannskoðarin geva Eftirlitinum eina frágreiðing, um skiftið skyldast serligar umstøður.

Stk. 7. Við grannskoðaraskifti í tryggingarfeløgum, hvørs partabrøv ella lánsbrøv verða virðisskrásett almennt, skal grannskoðarin eisini beinanvegin geva fráboðan um hetta til Københavns Fondsbørs.

Stk. 8. Grannskoðarin, ið tekur við, skal venda sær til fráfarandi grannskoðaran, ið hevur skyldu at upplýsa um grundirnar til fráfaringina.

§ 114. Er eingin ella bert ein grannskoðari í felagnum, ella lýkur ein grannskoðari ikki krøvini í § 111, stk. 1 og 2 ella § 112 stk. 1 ella § 13, stk. 1 í løgtingslóg um løggildar grannskoðarar ella § 7, stk. 1 í løgtingslóg um skrásettar grannskoðarar ella í teimum í viðtøkunum hesum viðvíkjandi ásettu reglum, skal Eftirlitið tilnevna grannskoðarar.

Stk. 2. Tilnevning av grannskoðarum samhært stk. 1 er galdandi fyri tíðina til nýggir grannskoðarar eru valdir á fyrisettan hátt.

§ 115. Grannskoðararnir skulu grannskoða ársroknskapin í samsvari við góðan grannskoðannarsið og heruppií gera eina gjøgnumgongd, sum er vandin, av felagsins roknskapartilfari og tess viðurskiftum annars.

Stk. 2. Er felagið eitt móðurfelag, skulu grannskoðararnir hjá hesum eisini grannskoða samtøkuroknskapin og sínámillum roknskaparligu viðurskiftini hjá samtøkufyritøkunum.

Stk. 3. Hoyrir felagið til ein bólk av feløgum, sum Eftirlitið tekur avgerð um samhært § 3, stk. 2, skulu teir í § 111, stk. 5, 2. pkt. nevndu grannskoðarar eisini grannskoða tann roknskap, sum Eftirlitið fyrisetur samhært § 3, stk. 2, og sínámillum roknskaparligu viðurskiftini hjá bólkinum.

Stk. 4. Harafturat skulu grannskoðararnir ansa eftir, um tey í lógini ásettu krøv til nevndina um gerð av starvsskipan og um stovnan og førslu av bókum, skráum og gerðabókum eru lokin, og eisini um reglurnar í § 118 um framløgu og undirskriving av grannskoðannargerðabókini eru lokin. Um grannskoðararnir staðfesta, at tey umrøddu krøvini ikki eru lokin, skulu hesir gera eina serstaka frágreiðing um hetta, ið verður hjáløgd ársroknskapinum til aðalfundin. Grannskoðararnir skulu í seinasta lagi 10 dagar eftir, at frágreiðingin er gjørd senda Eftirlitinum hesa.

Stk. 5. Grannskoðararnir skulu ganga teimum krøvum viðvíkjandi grannskoðanini á møti, sum kunnu verða sett fram av aðalfundinum, um hesi ikki ganga ímóti lóg ella móti viðtøkum felagsins ella góðum grannskoðannarsiði.

§ 116. Nevndin og stjórnin skulu geva grannskoðarunum upplýsingar, sum kunnu verða mettar av týdningi fyri metingina av felagnum og - um felagið er eitt móðurfelag - samtøkuni.

Stk. 2. Nevndin og stjórnin skulu geva grannskoðarunum hovi til at gera tær kanningar, ið hesir meta neyðugar, og skulu síggja til, at grannskoðararnir fáa tær upplýsingar og ta hjálp, sum teir meta neyðuga fyri at kunna røkja sítt starv. Nevndin og stjórnin í einum dótturfelag hava samsvarandi skyldur mótvegis grannskoðarunum hjá móðurfelagnum ella teimum í § 111, stk. 5, 2. pkt. nevndu grannskoðarum.

§ 117. Eftir at grannskoðanin er endað, skulu grannskoðararnir við átekning á roknskapin vátta, at teir hava grannskoðað hann og tann møguliga samtøkuroknskapin.

§ 118. Grannskoðararnir skulu til nýtslu fyri nevndina føra ein grannskoðannargerðabók, ið verður løgd fram á hvørjum nevndarfundi. Eitthvørt, ið verður skrivað í gerðabókina, verður undirskrivað av øllum nevndarlimunum.

§ 119. Teir valdu grannskoðararnir hava altíð rætt at taka lut í nevndarfundum, tá mál verða viðgjørd, ið hava týdning fyri grannskoðanina ella fyri roknskapargreiðslana.

Stk. 2. Grannskoðararnir hava skyldu til at taka lut í viðgerð nevndarinnar av viðkomandi málum, um bert ein nevndarlimur ynskir tað.

Stk. 3. Grannskoðararnir hava rætt til at luttaka á aðalfundinum. Teir skulu vera til staðar, um nevndin ella ein, ið hevur atkvøðurætt, biður um tað. Í tryggingarfeløgum, hvørs partabrøv ella lánsbrøv verða virðisskrásett almennt, skal grannskoðarin vera til staðar á regluliga aðalfundinum. Á aðalfundinum skulu grannskoðararnir svara spurningum um roknskapir v.m., sum grannskoðarin skal átekna, og verða viðgjørdir á avvarðandi aðalfundinum.

§ 120. Grannskoðararnir skulu ansa eftir, at stjórnin og nevndin halda skyldurnar samhært § 161, stk. 7.

§ 121. Grannskoðararnir og teirra hjálparmenn hava ikki rætt at geva upplýsingar um viðurskiftini hjá

felagnum til einstakar partaeigarar – í sínámillum feløgum ábyrgdarar, limir ella sendimenn – ella til óviðkomandi.

Stk. 2. Eftirlitið kann áleggja grannskoðarunum at geva upplýsingar um viðurskifti felagsins til Eftirlitið.

Stk. 3. Eftirlitið kann gera nærri reglur um fremjingina av grannskoðanini, heruppií um stovnan av innanhýsis grannskoðannardeildum.

Stk. 4. Stk. 2 og 3 eru galdandi samsvarandi fyri feløg í samtøkuni.

§ 122. Ein partaeigari ella í sínámillum feløgum ein limur, ein ábyrgdari ella ein sendimaður kann á regluliga aðalfundinum ella á einum aðalfundi, har evnið er sett á fundarskránna, seta fram uppskot um eina eyka granskan av stovnan felagsins ella av nærri tilskilaðum viðurskiftum viðvíkjandi umsiting felagsins ella av ávísum roknskapum. Verður uppskotið samtykt við vanligum meiriluta, velur aðalfundurin ein ella fleiri granskarar.

Stk. 2. Verður uppskotið ikki samtykt, men fær tað tó undirtøku frá partaeigarum, ið umboða 25 prosent av partapeninginum ella viðvíkjandi sínámillum feløgum frá 25 prosent av teimum, sum hava atkvøðurætt á aðalfundinum, kann ein partaeigari ella ein, sum hevur atkvøðurætt í seinasta lagi 1 mánað eftir aðalfundin, biðja skiftirættin um at tilnevna granskarar. Skiftirætturin skal geva leiðslu felagsins og grannskoðarum, Eftirlitinum og í givnum føri honum, hvørs viðurskifti áheitanin fevnir um, høvi at siga sína áskoðan, áðrenn hann tekur avgerð. Áheitanin skal einans verða gingin á møti, um skiftirætturin metir hana verða nóg væl grundgivna. Skiftirætturin ásetir talið á granskarum. Avgerðin hjá Skiftirættinum kann verða kærd.

Stk. 3. Reglurnar í §§ 111, stk. 1, 112, 116, 119 og 121 skulu verða nýttar samsvarandi á granskarar.

Stk. 4. Granskararnir, ið skulu leggja fram eina skrivliga frágreiðing á aðalfuninum, hava rætt til at fáa samsýning frá felagnum. Um skiftirætturin hevur tilnevnt granskararnar, ásetir hesin samsýningina.

Stk. 5. Í seinasta lagi 8 dagar áðrenn aðalfundin skal frágreiðingin hjá granskarunum verða løgd fram til eftirlits fyri partaeigarar, ella í sínámillum feløgum fyri limir og ábyrgdarar, á felagsins skrivstovu. Frágreiðingin skal eisini verða send Eftirlitinum.

Kapittul 20

Serstakar reglur fyri sínámillum skaðatryggingarfeløg við avmarkaðum endamáli

§ 123. Ásetingarnar í hesum kapitli fevna um sínámillum skaðatrygginarfeløg, hvørs viðtøkur hava tilskilan um,

1) at felagsins endamál er avmarkað til at tekna tryggingar móti vanlukku og sjúku soleiðis, at tey tryggjaðu eisini eru tryggingartakarar, ella til at tekna tryggingar fyri húsdjór,

2) at felagið einans rekur virksemi her í landinum,

3) at felagið ikki teknar tryggingar fyri longri tíðarskeið enn 1 ár í senn,

4) at felagið einans teknar beinleiðis tryggingar,

5) ta størstu upphæddinn, sum felagið uttan endurtrygging kann taka ímóti á einstakan váða, ella áseting um, at reglur um hetta verða ásettar av Eftirlitinum í samband við veitan av loyvi, og

6) møguleika fyri krevjing av eykagjaldi ella niðursetan av veitingunum.

Stk. 2. Eilt sínámillum skaðatryggingarfelag kemur ikki undir ásetingarnar í hesum kapitli um so er, at

1) tann árliga tryggingargjaldsinntøkan fer upp um eina av Eftirlitinum ásetta upphædd, ella

2) minni enn helvtin av árligu tryggingargjaldsinntøkuni stavar frá likamligum persónum, ið eru limir í felagnum, ella

3) felagsins virksemi er av slíkum slag, at minstaupphædd gjaldførisbreddans verður roknað uttan lækkan sambært § 27, jbr. § 25, stk. 2.

§ 124. Reglurnar í § 13, § 17, stk. 2, nr. 2 og í partafelagslógini § 3, § 5, § 6, stk. 1 og 3-5, §§ 7-10, § 11, stk. 1 og 3 og § 176, kunnu ikki verða nýttar við stovnan av feløgum, ið hetta kapittul fevnir um.

Stk. 2. Viðtøkurnar kunnu áseta, at eingin stjóru skal verða sett.

§ 125. Teknan av limum ella ábyrgdarum kann ikki fara fram, áðrenn uppskot til viðtøkur er orðað. Uppskotið skal leggjast fram í samband við tekningina.

Stk. 2. Stovnandi aðalfundur skal verða hildin í seinasta lagi 6 mánaðir eftir, at tekningin er byrjað, um ikki ongin limur ella ábyrgdari er teknaður. Í síðst nevnda føri, fella burtur tær skyldur, sum verða átiknar við tekningina av felagsfæfeingi, og inngoldnar upphæddir verða afturgoldnar, tó við frádrátti av goldnum

útreiðslum, um hetta er treytað við tekningina.

Stk. 3. Til stovnandi aðalfundin verða tey, ið hava atkvøðurætt sambært uppskotinum til viðtøkur, boðaði til fundar.

Stk. 4. Aðalfundurin tekur við vanligum atkvøðumeiriluta avgerð um góðkenning av viðtøkunum og um felagið skal verða stovnað. Avgerð um broyting í uppskotinum til viðtøkur kann verða tikin við vanligum meiriluta uttan mun til ásetingar í uppskotinum um broytingar eftir stovnanina. Avgerð um broyting, sum ikki er tilskilað í fundarboðunum krevur tá samtykki frá øllum, ið hava atkvøðurætt. Avgerð um stovnan kann ikki verða tikin, fyrr enn viðtøkurnar eru endaliga góðkendar.

Stk. 5. Tá felagið er stovnað, verður vald nevnd og grannskoðarar sambært ásetingunum í viðtøkunum um hetta.

§ 126. Felagið skal fráboðast til skráseting hjá tí føroyska skrásetingarmyndugleikanum í seinasta lagi 2 mánaðir eftir stovnandi aðalfundin. Verður farið út um hesa freist, fella tær við tekningina av felagsfæfeingi átiknu skyldur burtur, jbr. § 125, stk. 2, 2. pkt. Eftir hetta kann skráseting ikki fara fram.

Stk. 2. Í seinasta lagi samstundis við fráboðanina um skráseting hjá tí føroyska skrásetingarmyndugleikanum skal felagið senda umsókn um loyvi, jbr. § 9, stk. 1 og 2 til Eftirlitið. Við umsóknini skal vera váttað úrskrift úr aðalfundargerðabókini.

§ 127. Tann í § 18, stk. 2 nevnda rakstrarætlan kann við Eftirlitsins loyvi verða avmarkað í áramál, ella ikki verða gjørd, um hetta ikki er neyðugt fyri at áseta grundarfæfeingið. Eftirlitið kann eisini við fyriliti fyri slagi og vavi fyrttøkunnar loyva, at einki felagsfæfeingi ella annað grundarfæfeingi er til.

§ 128. Hevur felagið onga stjórn, hevur nevndin tey størv, ið lógin hevur álagt stjórnini.

§ 129. Limir í nevnd og stjórn umboða felagið úteftir.

Stk. 2. Felagið verður bundið av rættargerðum, sum felagsins vegna verða gjørdar av samlaðu nevndini ella einum limi í nevndini ella einum stjóra.

Stk. 3. Tann tekningarrættur, sum tann einstaki limurin í nevndini eigur sambært stk. 2, kann í viðtøkunum verða avmarkaður soleiðis, at tekningarrætturin kann verða framdur av einum ella fleiri ávísum limum ella av fleiri saman. Onnur avmarking í tekningarrættinum kann ikki verða skrásett.

Stk. 4. Einans nevndin kann geva umboðsfulltrú. § 42 kemur ikki í nýtslu.

§ 130. Tann grannskoðaði og góðkendi ársroknskapurin skal verða sendur Eftirlitinum í tveimum eintøkum í seinasta lagi 10 dagar eftir, at roknskapurin er samtyktur og góðkendur.

Stk. 2. Eftirlitið letur tann eina av teimum í stk. 1 nevndu roknskapunum til tann føroyska skrásetingarmyndugleikan, ið kunnger móttøkuna í tí í Føroyum til almennar lýsingar góðkenda blað.

Stk. 3. Ásetingin í § 66 kemur ikki í nýtslu.

§ 131. Sínámillum tryggingarfeløg, ið § 123, stk. 1 fevnir um, og sum einans reka virksemi innan eitt heilt avmarkað landøki, koma ikki undir reglurnar í hesi lóg, jbr. tó stk. 2 og 3, um so er, at tær teknaðu tryggingarnar tilsamans ikki fara upp um 3 mió. kr.

Stk. 2. Feløg, sum stk. 1 fevnir um, skulu tó frámerkja seg sum sínámillum. § 12, stk. 2 verður at nýta samsvarandi.

Stk. 3. Er eitt sínámillum tryggingarfelag undir eftirliti sambært hesi lóg, verður felagið verandi undir eftirliti, hóast tað seinri lýkur treytirnar fyri undantøku sambært stk. 1. Eftirlitið kann tó sleppa felagnum undan eftirliti, um so er, at felagið setur fram áheitan um tað sambært eini aðalfundarsamtykt.

§ 132. Eftirlitið kann undantaka eitt sínámillum skaðatryggingarfelag, ið kemur undir § 123, stk. 1, frá reglunum í hesi lóg, um so er at

1) tær samlaðu tryggingarnar ikki fara upp um 6 mió. kr., og felagsins váði fyri einstaka trygging ikki fer upp um 3 prosent av felagsins samlaðu árligu tryggingargjaldsinntøku, ella

2) felagið einans teknar tryggingar á eimun avmarkaðum landøki og einans fyri eina einstaka tryggingargrein.

Stk. 2. Tá stk. 1, nr. 1 verður nýtt, verður fyrilit ikki tikið fyri, í hvønn mun felagið hevur minkað sín váða við endurtrygging.

Stk. 3. Eftirlitið kann nýta ásetingingina í stk. 1, nr. 2 sjálvt um felagið teknar tryggingar, sum § 123, stk.

1, nr. 1 ikki fevnir um, tá felagið tó ikki tekur ábyrgdartrygging, arbeiðsskaðatrygging, motorakfarstrygging, veðhaldstrygging ella lánstrygging.

Stk. 4. Áheitan hjá einum felag um undantøku sambæt stk. 1, skal vera góðkend av aðalfundinum.

§ 133. Setur eitt sínámillum skaðatryggingarfelag, ið kemur undir reglurnar í hesum kapitli, fram áheitan um tað sambæt aðalfundarsamtykt, kann Eftirlitið áseta, at felagið fullkomiliga skal koma undir tær vanligu reglurnar í hesi lóg. Tá ein slík avgerð er tikin, kunnu ásetingarnar í hesum kapitli tó verða nýttar, um Eftirlitið loyvir tí.

Kapittul 21
Serstakar reglur um ávísar eftirlønargrunnar

§ 134. Reglurnar í hesum kapitli fevna um felag ella felagsskapir (eftirlønargrunnar)

1) hvørs limir antin hava útbúgving innan ávís útbúgvingarøki ella starvast í einum ávísum slagi av fyritøkum, og sum hava til endamáls, sum liður í setanartreytunum ella sum liður í einum øðrum tilknýti til eina fyritøku at tryggja eftirløn sambæt einsháttaðum reglum fyri allar limirnar, ella

2) hvørs limir eru sjálvstøðugir vinnurekandi innan sama starvsgrein, og sum hava til endamáls at tryggja eftirløn sambæt einsháttaðum reglum fyri allar limirnar.

§ 135. Reglurnar fyri sínámillum lívstryggingarfelog verða við teimum í stk. 2 nevndu undantøkum at nýta samsvarandi á eftirlønargrunnar, ið hetta kapittul fevnir um.

Stk. 2. § 31, stk. 2-4 verða ikki at nýta á eftirlønargrunnar, ið hetta kapittul fevnir um.

§ 136. Eftirlitið kann seta nærri reglur um avmarking av limaskara og virksemi eftirlønargrunnsins.

Stk. 2. Føroya Landsstýri kann áseta nærri reglur um avmarkingina millum virksemi hjá eftirlønargrunnum og annað tryggingarvirksemi.

§ 137. Eftirlønargrunnar skulu í navninum týðuliga tilskila teirra eginleika sum eftirlønargrunnar. § 12, stk. 1, 1. pkt. kann ikki verða nýtt á eftirlønargrunnar.

§ 138. Um ikki Føroya Landsstýri við atliti til viðurskiftini hjá eftirlønargrunninum loyvir eina aðra samanseting av nevndini, skal heinda hava ein formann og eitt stakt tal av nevndarlimum, av hvørjum í minsta lagi helvtin skal verða vald av og millum limirnar í eftirlønargrunninum. § 49, stk. 6 í partafelagslógini kemur ikki í nýtslu.

Stk. 2. Í viðtøkunum kann tað hóast § 44 verða áset, at val av nevnd og broyting í viðtøkunum verður gjørd av limum felagsins við frumatkvøði.

Kapittul 22
Serstakar reglur fyri ávísar "firma"eftirlønargrunnar

§ 139. Reglurnar í hesum kapitli verða at nýta á ein og hvørjan felagsskap (eftirlønargrunn), ið við grundarlagi í einum lyfti um eftirløn hevur til endamáls at tryggja starvsfólkunum eftirløn í sambandi við starvssetan í eini fyritøku heruppí einum loyvishavandi felag, ella við starvssetan í tílíkum fyritøkum innan sama samtøku.

Stk. 2. Stk. 1 er ikki galdandi fyri lyftir um eftirløn

1) givið av Føroya Landsstýri, eini kommunu ella kommunalum felagsskapi,

2) givið til stjórar ella teirra eftirsitandi

3) skipað eftir serstakari lóg ella

4) givið av kommunalum felagsskapi, hvørs skyldum kommunur ábyrgdast fult fyri.

Stk. 3. Eftirlitið kann eftir samráðing við Føroya Landsstýri gera av, at ein eftirlønargrunnur fyri hvørs skuldum landsstýrið ella ein kommuna ábyrgist fullkomiliga, heilt ella fyri ein part skal verða undanrikin frá §§ 14, stk. 1, 25, 27, kap. 10, §§ 70, 72, 74 og kap. 15 og 18.

Stk. 4. Ein eftirlønargrunnur, ið veitir tænastumannalíknandi eftirløn, og sum danska ríkið ella ein komm-

una fullkomiliga ábyrgist fyri, kemur ikki undir hesa lóg.

Stk. 5. Eftirlitið kann áseta reglur um, at lyfti um eftirløn, ið er lítil, ikki kemur undir hesa lóg.

§ 140. Við limirnar í einum eftirlønargrunni er at skilja:

1) persónar, ið eru settir í starv í teirri ella teimum fyritøkum, sum eftirlønargrunnurin er knýttur at, og sum hava fingið lyfti um eftirløn,

2) fyrrverandi starvsfólk, ið fáa eftirløn úr eftirlønargrunni,

3) persónar, ið hava verið í starvi í fyritøkuni og sum sambært ásetingum í viðtøkunum hjá eftirlønargrunninum hava varðveitt rætin til eftirløn hóast setanarviðurskiftini eru hildin uppat.

Stk. 2. Viðtøkurnar kunnu avmarka limarættindini hjá teimum í stk. 1, nr. 3 nevndu persónum.

§ 141. Reglurnar í §§ 135-138 verða at nýta samsvarandi í hesum kapitli.

Stk. 2. Umframt tað, ið er tilskilað í stk. 1, kann ein eftirlønargrunnur ikki byrja sítt virksemi, fyrr enn eftirlønarreglugerðin hjá eftirlønargrunninum og fíggjarliga og tøkniliga grundarlagið er góðkent av Eftirlitinum.

Stk. 3. Viðtøkurnar skulu umframt tað, ið er tilskilað í stk. 1, hava reglur um:

1) Limir eftirlønargrunsins.

2) Hvussu farast skal fram, um ein ella fleiri av teimum fyritøkum, hvørs starvsfólk eftirlønargrunnurin fevnir um, heilt ella fyri ein part verða lagdar niður ella avhendaðar, ella fyritøkan av einhvørjari ørsøk ynskir at enda eftirlønarskylduna.

3) Reglur um avtøku av eftirlønargrunninum og nýtslu av ognum eftirlønargrunsins,

4) Mannagongd fyri loysn av ósemju millum ein lim og eftirlønargrunnin.

5) Viðtøkurnar skulu hava upplýsing um navnið á teirri ella teimum fyritøkum, sum eftirlønargrunnurin er knýttur at, og um tær skyldur, sum fyritøkurnar hava átikið sær mótvegis eftirlønargrunninum

Stk. 4. Eftirlønarreglugerðin skal hava ásetingar

um

1) Navn eftirlønargrunsins,

2) Ta kommunu her í landinum, har eftirlønargrunnurin skal hava sín heimstað,

3) Endamál eftirlønargrunsins,

4) Limir eftirlønargrunsins.

5) Reglur um støddina á eftirlønarupphæddunum og javning, teirra útrokning og útgjalding.

6) Reglur um rættindi limanna, tá teir fara burtur út eftirlønargrunninum,

7) Reglur um eftirlønargjald.

8) Reglur um rættindi og skyldur hjá limunum annars,

9) Tilskilan av teimum reglum sambært hvørjum eftirlønarskipanir við leypandi útgjaldingum teknaðar ella avtalaðar sum skyldubundnar skipanir í einum tryggingarfelag ella einum eftirlønargrunni kunnu verða fluttar frá og til eftirlønargrunnin í samband við skifti til annað starv.

Stk. 5. Umsókn um góðkenning av fíggjarliga og tøkniliga grundarlagi eftirlønargrunsins skal hava tilskilan um:

1) grundarlag fyri útrokning og javning av eftirlønargjaldi og veitingum og eftirlønarburturleggingum,

2) teir eftirlønarformar, ið eftirlønargrunnurin ætlar at nýta,

3) reglur um útrokning av endurgjøldum í samband við, at farið verður burtur úr eftirlønargrunninum og ognatpørtum,

4) reglur um útrokning og býti av yvirskoti til limirnar og um rindan av undirskoti,

5) reglur um heilsumeting,

6) ta hægstu upphædd, sum eftirlønargrunnurin uttan endurtrygging skal kunna taka við á einstakan váða, og

7) útreiðslur í samband við umsiting grunsins.

Stk. 6. 1) Ein eftirlønargrunnur skal hava í minsta lagi 50 limir.

2) Um talið á limunum í einum eftirlønargrunni verður minni enn 50, skal eftirlønargrunnurin beinanvegin heita á Eftirlitið um at gera av, um og um so verður, við hvørjum treytum, eftirlønargrunnurin kemur at halda áfram við sínum virksemi.

Kapittul 23
Bygningsbrunatrygging

§ 142. Eitt tryggingarfelag, ið teknar bygningsbrunatrygging, skal við teimum avmarkingum, ið fylgja av tess viðtøkum ella tess loyvi, trygggja allar bygningar.

Stk. 2. Felagið kann tó nokta at trygggja:

1) bygningar, ið ikki eru fullvel innrettaðir móti eldsvanda,

2) tómar bygningar.

§ 143. Eitt felag kann ikki slíta eina trygging vegna tað, at tryggingargjaldið ikki er goldið.

Stk. 2. Ein tryggingartakari kann einans enda tryggingina við samtykki frá teimum, sum hava rettindi sambæri øllum heimildum og skuldbindingum, ið eru línglýstar á ognina, um ikki ognin uttan at rettarstøðan hjá hesum verknar verður tryggjað í einum øðrum felag, sum hevur loyvi at reka bygningsbrunatrygging.

§ 144. Eftirlitið ásetir minstutreytirnar fyri tekning av bygningsbrunatrygging hjá tryggingarfelagnum.

Stk. 2. Fyri at trygggja tryggingarfulnað um so er, at felagið fer á húsagang ella í avtøku, kann Føroya Landsstýri áseta nærri reglur um sínamillum skuldbinding fyri øll tryggingarfelag, ið hava teknað bygningsbrunatrygging fyri bygningar her í landinum.

Stk. 3. Upphæddir, ið koma inn í búgvið frá rindan av endurtrygging av bygningsbrunatrygging, verða nýttar framfhjá til rindan av krøvum frá tryggingarfelagum, ið hava fokið tryggingarskyldurnar, sum liggja á tí tryggingarfelagnum, sum er farið á húsagang ella í avtøku. Kravið víkir tó fyri teimum í §§ 93 og 94 í konkurslógini nevndu krøvum, í tann mun besi krøv ikki kunnu verða rindað av binum ognunum í búnum.

§ 145. Felagið hevur pantingarrætt fyri tryggingargjøld við afturatkomnum rentum og aðrar útreiðslur. Felagið hevur harafturat pantingarrætt fyri veitingunum í tí tryggjaðu ognini eftir frammanfyri standandi veðrættindi í ognini í 1 ár frá gjaldkomutíð.

Kapittul 24
Arbeiðsskaðatrygging

§ 146. Umsókn um loyvi at reka arbeiðsskaðatryggingarvirksemi skal verða send Eftirlitinum og við skulu fylgja:

1) vanligu tryggingartreytir felagsins við tilskilan í hvønn mun hesar verða tiknar við í felagsins tryggingarskjøl,

2) tilskilan av meginreglum fyri útrokning av tryggingargjoldunum,

3) tilskilan av meginreglum um útrokning av tryggingarligum hurturleggingum,

4) tilskilan av endurtryggingarviðurskiftunum,

5) tilskilan av teimum reglum, sambæri hvørjum felagið kann taka ímóti endurtrygging og

6) tilskilan av meginreglum fyri útbýting av eykaágóða.

§ 147. Loyvi jbr. § 9 stk. 1 og 2 kann ikki verða givið fyrr enn Eftirlitið hevur góðkent tryggingarfelagsins vanligu tryggingartreytir og tess tøkniliga grundarlag.

Stk. 2. Broytingar í teimum góðkendu tryggingartreytunum fyri arbeiðsskaðatrygging skulu verða sendar til góðkenningar í Eftirlitinum innan 1 mánað eftir, at broytingarnar eru samtyktar. Broytingarnar hava ikki gildi fyrr enn Eftirlitið hevur givið frábodan um góðkenning.

§ 148. Eitt tryggingarfelag skal ganga inn í eina felagsskipan (pool) fyri fonartalsjavning av leypandi veitingum. Eftirlitið kann í serstøkum førum gera undantak frá hesum kravi.

Stk. 2. Eftirlitið kann áseta nærri reglur fyri hesa felagsskipan.

§ 149. Tá eitt tryggingarfelag hevur tikið við váðanum hjá einum tryggingarskyldugum arbeiðsgevara, ábyrgist felagið sjálvt um tryggingaravtalan er grundað á skeivar fortreytir viðvíkjandi tryggingarábyrgdar innar slag og vídd.

§ 150. Til rindan av leypandi veitingum sambæri arbeiðsskaðatryggingarlógini, skulu øll tryggingarfelog

gera eina serstaka burturlegging, ið verður sett fyri seg í fíggjarjavnaðum (fíggjarstoðuni).

Stk. 2. Eftirlitið ásetir útrokningargrundarlagið fyri burturleggingar til rindan av leypandi veitingum.

§ 151. Eftirlitið ásetir nærri reglur fyri virðisásetingina av ognum til rindan av burturleggingum til rindan av leypandi veitingum.

Stk. 2. Fyri ognir svarandi til burturleggingar til rindan av leypandi veitingum verða §§ 70, 71 og 74 at nýta samsvarandi.

§ 152. Eitt tryggingarfelag hevur skyldu til at ásetta tryggingargjøldini soleiðis, at undfram tað sum er neyðugt til rindan av felagsins tryggingarliga váða sambæt lógini, einans verður krav tað, ið er neyðugt til rindan av útreiðslum av einari fullgóðari umsiting, stimbran og einum rímligum vinningsbýti. Eftirlitið ásetir nærri reglur fyri hesi útrokning.

Stk. 2. Eftirlitið kann ásetta nærri reglur fyri eini felagsskipan til yvirtøku av vinnusjúkuváða.

§ 153. Við broyting av veitingum sambæt arbeiðsskaðatryggingarlógini og teimum burturleggingunum, sum hoyra til, hevur eitt tryggingarfelag, hóast gjørdar tryggingaravtalur, rætt til uttan ávaring at javna tey ásettu tryggingargjøldini. Samsvarandi er galdandi, um broyting bendir í talinum og vavinum av góðkendum vinnusjúkum.

Stk. 2. Hóast eina tryggingargjaldsjavning verða teknaðar tryggingar verandi í gildi, til tær ganga út.

Stk. 3. Meinar ein tryggingartakari, at ein gjørd tryggingargjaldshækking, ið ikki hevur heimild í tryggingaravtaluni, er størri, ella at ein tryggingargjaldslækking er minni, enn tað, ið svarar til tu útreiðslubroyting, ið skyldast teimum í stk. 1 nevndu broytingum, kann tryggingartakarin leggja spurningin fyri Eftirlitið innan 4 vikur eftir, at hann hevur móttikið fráboðan um broytingina í tryggingargjaldinum.

§ 154. Tryggingargjøld, afturatkomnar rentur av tryggingargjøldum og aðrar útreiðslur í sambond við, at tryggingargjøld ikki eru goldin rettstundis, hava útpantingarrætt.

§ 155. Eitt tryggingarfelag kann ikki verða upplevst, um ikki tað frammanundan hevur flutt alla sína tryggingarmongd til eitt annað felag í samsvari við tær í § 91 ásettu reglur, ella tess arbeiðsskaðatryggingarmongd er tikin undir umsiting av Eftirlitinum sambæt arbeiðsskaðatryggingarlógini.

§ 156. Eftirlitið krevur, at eitt tryggingarfelag innan eina freist, ið Eftirlitið ásetir, skal gera tær fyriskipanir, ið verða mettar neyðugar, um so er at:

1) felagið ikki hevur burturlagt nóg stórar upphæddir til rindan av tryggingarligum skyldum,

2) Eftirlitið ikki metir, at ogn felagsins er verður tryggjandi umsitin,

3) tað vísir seg, at tær, til rindan av burturleggingum til leypandi veitingar, burturlagdu ognir ikki eru tryggjandi, ella

4) onkur av teimum í § 172, stk. 1, nr. 1, 2 ella 5 nevndu umstøður eru til staðar.

Stk. 2. Eru tær krevdu fyriskipanirnar ikki gjørdar innan ásettu freistina, kann Eftirlitið afturkalla loyvi tryggingarfelagsins at reka arbeiðsskaðatryggingarvirksemi, og síðani verður tryggingarmongdin tikin undir umsiting av Eftirlitinum sambæt arbeiðsskaðatryggingarlógini.

Kapittul 25
Eftirlit

§ 157. Føroya Landsstýri verður heimilað, við gildiskomu lógarinnar at tilnevna ein almennan myndugleika (Eftirlitið) at hava eftirlit við tí tryggingarvirksemi, ið henda lóg fevnir um.

Stk. 2. Eftirlitið ansar eftir, at henda lóg verður hildin og tær ásetingar, ið eru givnar við heimild í lógini, jbr. tó § 17. Tann føroyski skrásetingarmyndugleikin ansar eftir, at § 17 verður hildin.

Stk. 3. Eftirlitið røkir tær í stk. 1 nevndu uppgávur saman við einum ráði (Tryggingarráðnum).

Stk. 4. Føroya Landsstýri ger fyriskipan fyri virksemi Eftirlitsins, herundir um tess samvirki við ráðið og um samstarvið við tryggingareftirlit í øðrum londum.

§ 158. Føroya Landsstýri verður heimilað at setta á stovn tað í § 157, stk. 3 nevnda ráð, og at gera viðtøkur fyri tess virksemi og starvsskipan.

Stk. 2. Ein meiriluti av limum ráðsins skulu vera óheftir av tryggingarfeløgum, av oðrum fyritøkum, ið eru undir tess eftirliti, og av felagsskapum fyri besar fyritøkur.

Stk. 3. § 163 verður nýtt samsvarandi fyri limir ráðsins.

§ 159. Tey, ið starvast í Eftirlitinum, kunnu ikki hava fíggjarlig áhugamál í ella vera knýtt at nøkrum tryggingarfelag, aðrari fyritøku, ið er undir Eftirlitsins eftirliti, ella at felagsskapum fyri besar fyritøkur.

§ 160. Tryggingarfeløgini skulu geva Eftirlitinum tær upplýsingar, ið eru neyðugar fyri virksemi Eftirlitsins. Eftirlitið skal kanna viðurskiftini hjá teimum tryggingarfeløgum, ið lógin fevnir um.

Stk. 2. Í tann mun tað er neyðugt til metingar av fíggjarligu støðuni hjá einum tryggingarfelag, hevur Eftirlitið harafturat atgongd til at fáa upplýsingar og gera eftirlitsvitjanir hjá fyritøkum, sum felagið hevur serstakt beinleiðis ella óbeinleiðis samband við, jbr. orðaskiljingarnar í § 1, stk. 2, nr. 5, 7 og 8 í ársroknskaparlógini.

Stk. 3. Eftirlitið kann í serstøkum førum nýta fremmanda hjálp.

§ 161. Fyri tryggingarfeløg fremur Eftirlitið tær heimildir, ið eru givnar tí føroyska skrásetingarmyndugleikanum í § 72, stk. 2, § 117, stk. 1 og § 118 í partafelagslógini.

Stk. 2. Avgerð um fæfeingislækkan skal góðkennast av Eftirlitinum í teimum í § 44 a, stk. 1, nr. 2 og 3 í partafelagslógini nevndu førum.

Stk. 3. Avgerð um, at nýggj partabrøv skulu kunna verða inngoldin við umskiftan av skuld sambært § 33 a í partafelagslógini skal góðkennast av Eftirlitinum.

Stk. 4. Lántøka hjá lívstryggingarfeløgum sambært § 43 í partafelagslógini skal góðkennast av Eftirlitinum.

Stk. 5. Útvegar eitt tryggingarfelag sær egin partabrøv, jbr. § 48 í partafelagslógini, skal hetta góðkennast av Eftirlitinum. § 48 a í partafelagslógini kemur ikki í nýtslu.

Stk. 6. Nevndin í einum móðurfelag skal so skjótt samtøkuviðurskifti eru stovnað geva nevndini í einum dótturfelag og Eftirlitinum fráboðan.

Stk. 7. Stjórnin og nevndin skulu beinanvegin fráboða Eftirlitinum upplýsingar um viðurskifti, ið hava stóran týdning fyri framhaldandi virksemið hjá felagnum.

Stk. 8. Tey í samband við eina hækking av felagsfæfeinginum gjørdu skjøl skulu í váttaðum makaskjølum sendast Eftirlitinum.

Stk. 9. Samtyktir sambært § 126 í partafelagslógini um, at avtøka skal halda uppat, skal góðkennast av Eftirlitinum.

§ 162. Eftirlitið skal gera kanningar, ið hóska til at fremja yvirlitið yvir tryggingarmarknaðin. Eftirlitið kann sjálvstøðugt ella í samstarvi við almennar myndugleikar kunngera úrslitini av slíkum kanningum.

Stk. 2. Feløg, ið ein kanning fevnir um, skulu verða kunnað um úrslitini áðrenn eina møguliga kunngering og kunnu krevja, at tryggingartøkniligar útrokningar og hættir v.m., ið hava eyðkenni sum handilsloyndarmál, ikki verða kunngjørd.

Stk. 3. Feløgini hava rætt at krevja, at tiknar verða við stuttorðaðar viðmerkingar til niðurstøðurnar av kanningunum í samband við kunngering av hesum, um viðmerkingarnar eru settar fram fyri Eftirlitinum í seinasta lagi 30 dagar eftir, at úrslitini av kanningini eru móttikin.

§ 163. Tey, ið starvast í Eftirlitinum og serfrøðingar, ið virka ella hava virkað vegna Eftirlitið, hava undir ábyrgd sambært §§ 152-152e í revsilógini skyldu til at dylja tað, sum tey gjøgnum teirra virksemi verða vitandi um. Hesar upplýsingar kunnu tó verða latnar víðari í stuttum ella samlaðum liki, tá hvørki tað einstaka tryggingarfelagið ella tess viðskiftafólk kunnu eyðmerkjast.

Stk. 2. Ásetingin í stk. 1 er ikki til hindurs fyri, at trúnaðarupplýsingar verða latnar víðari:

1) til aðrar almennar myndugleikar, heruppií ákærumyndugleikan og løgregluna í samband við føri, ið straffilóggávan fevnir um.

2) í einum borgarligum rættarmáli, tá eitt tryggingarfelag er tikið til fíggjartrotaviðgerð, ella er farið í avtøku, sum fylgja av einum rættarúrskurði, og um so er, at upplýsingarnar ikki viðvíkja triðjantanni, ið er við í eini royndi at bjarga tryggingarfelagnum.

3) til stovnar, ið eru við í avtøku og trotabúarviðgerð og líknandi viðgerðum, og persónar, ið hava ábyrgdina av teirri lógbodnu grannskoðanini av roknskapunum hjá tryggingarfeløgum og oðrum fíggingarstovnum, við teirri fortreyt, at hesir móttakarar av upplýsingum hava lørv á teimum fyri at kunna røkja sínar upp-

gávur,

4) til stovnar, ið umsita avtøku- ella ábyrgdarskipanir við teirri fortreyt, at upplýsingarnar eru neyðugar fyri, at teir kunnu útinna sítt virksemi,

5) til Føroya Landsstýri, sum liður í tess yvireftirliti,

6) til løgtingsins umboðsmann ella til eina tingnevnd, sum løgtingið hevur sett,

7) til kanningarrættir settir við lóg ella sambæt § 21 ella 21 a í rettargangslógini ella

8) til umsitingarligar myndugleikar og dómstólar, ið viðgera avgerðir, ið Eftirlitið hevur tikið.

Stk. 3. Ásetingin í stk. 1 er ikki til hindurs fyri, at Eftirlitið samtíðis við tingingar um avbending av eini tryggingarmongd við atliti til trygging av endurtryggingarfulnaði letur viðari upplýsingar til umboð fyri feløg, ið koma undir eina sambæt § 144 ásetta skuldbindingarskipan.

Stk. 4. Trúnaðarupplýsingar, sum Eftirlitið fær, kunnu einans verða nýttar sum liður í eftirlitsvirksemi Eftirlitsins, til at áleggja revsitiltøk, ella um avgerð Eftirlitsins verður kærd til hægri fyrisitingarligan myndugleika ella lagd fyri dómstólarnar.

Stk. 5. Føroyskir myndugleikar v.m., ið sambæt stk. 2 fáa upplýsingar frá Eftirlitinum, koma undir ta í stk. 1 umrøddu tagnarskyldu.

Stk. 6. Sum partur í viðurskiftunum til Eftirlitið verður einans ta tryggingarfelag mett, ið eftirlitsvirksemið sambæt lógarinnar kapittul 25 viðvíkur.

§ 164. Eftirlitið letur Føroya Landsstýri eina árliga frágreiðing um virksemið hjá tryggingarfeløgunum.

Stk. 2. Eftirlitið ger av, í hvønn mun frágreiðingin skal kunngerast.

§ 165. Eftirlitið kann ásetta nærri reglur um fráboðan sambæt § 19, heruppí um, í hvønn mun fráboðanirnar skulu verða atkomuligar hjá almenningunum.

§ 166. Til rindan av útreiðslum av Eftirlitsins eftirliti við tryggingarfeløgum og eftirlønargrunnum verður álíknað hvørjum av besum ein upphædd, ið verður ásett sambæt reglunum í stk. 2-4, tó í minsta lagi 1.000 kr. árliga.

Stk. 2. Full gjaldsskylda áliggur einhvørjum tryggingarfelag v.m. Eftirlitið kann tó sleppa einum felag í avtøku undan gjaldi, tá umstøðurnar tala fyri hesum.

Stk. 3. Eftirlitið ger álíkningina av gjaldinum við grundarlagi í seinasta almanakkaári. Tá gjaldsskriin verður roknað út, verða Eftirlitsins útreiðslur býttar millum fylgjandi bólkar:

1) tryggingarfeløg, ið reka lívstryggingarvirksemi,

2) tryggingarfeløg, ið reka annað virksemi enn lívstrygging,

3) eftirlønargrunnar, ið koma undir eftirlit sambæt hesi lóg

Stk. 4. Býtið millum bólkarnar í 1-3 pensiónskassar, sum eru undantaðir av lóg um eftirlit við firmapensiónskassum, verður gjørt við grundarlagi í partinum hjá tí einstaka bólkinum av teirri samlaðu rentuinntøkuni og bruttotryggingargjaldsinntøkuni v.m. frá teimum í Føroyum teknaðu beinleiðis tryggingum. Býtið millum feløgini í bólki 1 og 2 verður gjørt í mun til bruttotryggingargjaldsinntøkuna frá teimum í Føroyum teknaðu beinleiðis tryggingunum og innan bólk 3 við grundarlagi í lívmagjaldi og rentuinntøkum.

Stk. 5. Innan september mánaði er úti letur Eftirlitið hvørjum einstøkum tryggingarfelag v.m. fráboðan um støddina á tess gjaldi, og skal hetta verða goldið innan almanakkaárið er úti. Eftirlitið hevur pantingarrætt fyri gjaldini.

Stk. 6. Tey tryggingarfeløg, ið koma undir reglurnar í § 123 skulu gjalda eina upphædd uppá 50 prosent av teirri sambæt reglunum í stk. 1–4 útroknaðu upphædd, tó í minsta lagi 400 kr. árliga.

Stk. 7. Útreiðslurnar av einari grannskoðan, sum Eftirlitið hevur sett í verk, kann áleggjast felagnum av Eftirlitinum, ið ásetir støddina á grannskoðannarsamsýningini.

§ 167. Tryggingarfeløg og teir eftirlønargrunnar, ið henda lóg fevnir um, verða skrásettir hjá tí føroyska skrásetingarmyndugleikanum.

§ 168. Móttøka av samanleggingaraetlanum, klovningaraetlanum og metingarfrágreiðingum sambæt § 14, stk. 2 og § 16 og eisini § 33, stk. 1 og § 41 í partafelagslógini skal Eftirlitið beinanvegin lata kunngera í tí í Føroyum til almennar lýsingar góðkenda blað, og tær eru hereftir atkomuligar fyri almenningin. Tann føroyski Skrásetingarmyndugleikin skal beinanvegin kunngera skrásetingar í tí í Føroyum til almennar lýsingar góðkenda blað, og eru eftir hetta atkomuligar fyri almenningin.

§ 169. Leggur Føroya Landsstýri sínar heimildir eftir lógini til Eftirlitið, kann landsstýrið áseta reglur um kærurætt, heruppií at kærur ikki kunnu leggjast fyri bregri umsitingarligan myndugleika.

§ 170. Avgerðir, sum Eftirlitið ella tann Føroyski Skrásetingarmyndugleikin hevur tikið sambæri lógini, ella reglum gjørdar við heimild í lógini, kunnu verða lagdar fyri eina kærunevnd, sum er sett av Føroya Landsstýri, í seinasta lagi 4 vikur eftir, at avgerðin er fráboðað viðkomandi.

Stk. 2. Føroya Landsstýri kann gera avtalu við Ídnaðarmálaráðið um, at tær í stk. 1 nevndu avgerðir kunnu verða lagdar fyri "Industriministeriets Erhvervsankenævn".

Stk. 3. Verður ein avgerð, sum Eftirlitið hevur tikið um, at felagið skal fara í avtøku, ella tess tryggingarmongd verða tikin undir umsiting umgjørd, skal tann Føroyski Skrásetingarmyndugleikin beinanvegin skráseta hetta. Eftirlitið skal, um felagið eigur fasta ogn, síggja til neyðuga tinglýsing.

Kapittul 26
Endurreisingarætlanir og aðrar fyriskipanir

§ 171. Er grundarfæfeingið hjá einum tryggingarfelag ikki nóg stóri, skal Eftirlitið krevja, at felagið ger eina ætlan fyri endurreising av tess fíggjarligu stoða og leggja ætlanina fyri Eftirlitið til metingar av, um ætlanin hevur tey tiltøk, ið verða mett at verða neyðug.

Stk. 2. Um so er at:

1) grundarfæfeingið í einum tryggingarfelag er minni enn ein triðingur av tí útroknaða gjaldførisbreddanum, ella

2) grundarfæfeingið í einum tryggingarfelag er minni enn tann við atliti at slagi av virksemi ásetta minstaupphædd, ella

3) tað grundarfæfeingi hjá lívstryggingarfeløgum, ið samsvarar einum triðingi av tí útroknaða gjaldførisbreddanum, viðvíkjandi minni enn helvtini er sammansett av fylgjandi: óinngoldnum parta- ella ábyrgdarpeningi, helvtini av ikki inngoldnum parta- ella ábyrgdarpeningi, stovnsgrunni, lógásettum tiltøkum, ið ikki samsvara við skyldur ella fluttum yvirskoti, ella

4) tann við atfiti at slagi av virksemi fyri lívstrygging ásetta minstaupphædd, ikki einans er sammansett av teimum í nr. 3 nevndu luturnum, skal ætlan felagsins stevna at eini endurstovnan av tess fíggjarligu støðu yvir eitt styttri tíðarskeið, ið Eftirlitið ásetir.

Stk. 3. Hevur felagið sambæri lógini lagt eina rakstrarætlan fyri Eftirlitið, tekur Eftirlitið, um so er, at fíggjarliga støðan hjá felagnum er versnað í mun til hesa ætlan, avgerð um tær fyriskipanir, ið eru neyðugar, og kann heruppií krevja, at ein nýggj rakstrarætlan verður gjørd fyri 3 tey næstu árini.

§ 172. Eftirlitið krevur, at eitt lívstryggingarfelag innan eina freist, sum Eftirlitið ásetir, skal gera tær fyriskipanir, ið verða mettar neyðugar, um so er, at

1) felagið ikki hefdur hesa lóg, ella sínar viðtøkur,

2) felagið víkir frá tí grundarlagi, sum er galdandi fyri tess virksemi

3) Eftirlitið ikki metir, tað í nr. 2 nevnda grundarlag ella tann hátt, sambæri hvørjum ognir felagsins eru settar, at vera tryggjandi,

4) tað vísir seg, at tann til rindan av lívstryggingarburturleggingum avsetta ogn ikki er tryggjandi, ella

5) felagsins fíggjarliga stoða er versnað soleiðis, at ábúgamáltni hjá teimum tryggjaðu eru í vanda.

Stk. 2. Eru tær kravdu fyriskipanirnar ikki gjørdar innan ásettu freistina, og verður undantátið mett at viðføra vanda fyri tey tryggjaðu, kann felagsins lívstryggingarmongd verða tikin undir umsiting sambæri kapittul 14.

Stk. 3. Ein lívstryggingarmongd skal verða tikin undir umsiting um tað vísir seg, at tað innan ta sambæri stk. 1 ásettu freist ikki verður gjørligt at útvega tann til rindan av lívstryggingarburturleggingunum neyðuga pening.

Stk. 4. Fer eitt felag í avtøku, kann Eftirlitið taka avgerð um, at felagsins lívstryggingarmongd skal verða tikin undir umsiting.

Stk. 5. Metir Eftirlitið, at tað, tá tryggingarmongdin er tikin undir umsiting, eisini fer at verða neyðugt, at felagið verður tikið av, tekur Eftirlitið avgerð um hetta.

§ 173. Eftirlitið krevur, at eitt felag, ið rekur annað virksemi enn lívstryggingarvirksemi innan eina freist, sum Eftirlitið ásetir, skal gera tey tiltøk, ið eru neyðug, um so er, at

1) felagið ikki hevur burturlagt nóg stórar upp bæddir til rindan av tryggingarligum skyldum,
2) Eftirlitið ikki metir, at felagsins ognir eru settar á tryggjandi hátt, ella
3) onkur av teimum í § 172, nr. 1 ella 5 nevndu umstøðunum eru til staðar.

Stk. 2. Eru tær kravdu fyriskipaninar ikki gjørdar innan ta ásetta freistina, og verður undanlátið mett at viðføra vanda fyri tey tryggjaðu, kann Eftirlitið taka avgerð um, at felagið skal fara í avtøku.

§ 174. Sum liður í teimum í § 171, stk. 3, § 172, stk. 1 og § 173, stk. 1 nevndu tiltøkum, kann Eftirlitið sýta felagnum at ráða yvir tess ognum, ella avmarka tess ræði yvir hesum. § 74, stk. 9-10 verða at nýta samsvarandi.

§ 175. Eftirlitið kann heilt ella fyri ein part taka aftur loyvið hjá einum tryggingarfelag, um so er, at:
1) felagið ikki innan tær freistir, sum Eftirlitið hevur sett, hevur gjørt tey tiltøk, sum eru tilskilað í teimum í § 171, stk. 1 og 2 nevndu endurreisingarætlanum,
2) felagið ikki longur lýkur treytirnar fyri at fáa loyvi, ella
3) felagið grovt setir til viks tær skyldur, ið áliggja tí sambæri hesi lóg.

Stk. 2. Verður loyvið hjá einum tryggingarfelag tikið aftur, ger Eftirlitið av, um tryggingarfelagið skal royna at fáa tryggingarmongdina avhendaða til eitt ella fleiri tryggingarfeløg, ið reka tryggingarvirksemi í Føroyum, ella um felagið á annan hátt skal royna at fáa tryggingarmongdina greiddu. Fyri lívstryggingarfeløg kann Eftirlitið gera av, at tryggingarmongdin verður tikin undir umsiting í samsvari við kapittul 14.

Stk. 3. Eftirlitið kann í samband við, at loyvið hjá einum tryggingarfelag verður tikið aftur, sýta felagnum at ráðaryvir tess ognum ella avmarka tess ræði yvir teimum. § 74, stk. 9-10 verða at nýta samsvarandi.

Stk. 4. Føroya Landsstýri kann taka aftur loyvi hjá einum tryggingarfelag, um tað ikki longur lýkur tær í § 9, stk. 2 nevndu reglur um, at tað í §§ 14, 25 og 27 nevnda fæfeingi er føroyskt.

§ 176. Eftirlitið skal skjótast gjørligt, eftir at avtøka sambæret § 173 er byrjað, í samráð við avtøkustjórarnar lata kanna, um tað fer at verða hóskandi at royna at fáa tryggingarmongdina heilt ella fyri ein part avhendaða til eitt ella fleiri tryggingarfeløg, ið reka virksemi í Føroyum. Kemur tilboð um slíka yvirtøku, skal Eftirlitið, um tað metir, at tikið kann verða við tilboðnum, lata gera eina frágreiðing um støðuna og eitt uppskot til sáttmála við viðkomandi felag.

Stk. 2. Frágreiðingin og uppskotið skulu kunngerast í tí í Føroyum til almennar lýsingar góðkenda blað og í dagblløðum. Frágreiðingin skal luva áheitun á tryggingartakararnar um innan eina freist, sum Eftirlitið ásetir, ið ikki kann vera styttri enn ein mánaður, skrivliga at fráboða Eftirlitinum, um teir mótmæla avhendingini. Felagið skal samstundis senda teimum tryggingartakarunum, hvørs bústaður er felagnum kunnigur, frágreiðingina og uppskotið.

Stk. 3. Eftir at tann í stk. 2 nevnda freist er úti, ger Eftirlitið við atliti til tey innkomnu mótmælini av, um tryggingarmongdin kann verða avhendað í samsvari við tað framsetta uppskotið.

Stk. 4. Eftirlitið kann í samband við gerð av frágreiðing eftir samráðing við tað yvirtakandi felagið gera av, at tryggingar, sum eru teknaðar fyri eitt tíðarskeið, sum er lungri enn 1 ár, av báðum partum kunnu verða uppsagdar eftir teimum reglum, sum sambæret tryggingaravtalunni eru galdandi, um tað fleirára tíðarskeiðið, sum er í avtaluni, var úti. Reglurnar um hetta høvi til uppsøgn, skulu verða endurgivnar í frágreiðing Eftirlitsins.

Stk. 5. § 27, stk. 2 í lóg um tryggingaravtalur verður at nýta samsvarandi, til Eftirlitið hevur tikið avgerð sambæret stk. 3. Hendir avhending í samsvari við avgerð Eftirlitsins, kann avtoka og avhending hóast § 26 og § 27 í lóg um tryggingaravtalur ikki verða nýtt sum grundarlag fyri at slíta tryggingaravtaluna.

Kapittul 27
Ymiskar ásetingar

§ 177. Um so er, at tryggingartakarin og tann tryggjaði ikki eru ein og sami persónur, kann eink tryggingarfelag, uttan samtykki frá tryggjaða tekna nakað slag av lívstrygging, sambæret hvørji tað við deyða tryggjaða pliktar seg til at rinda hægri upphæddir enn tey inngoldnu tryggingargjaldini við rentum.

Stk. 2. Eink felag kann tekna nakað slag av lívstrygging sambæret hvørji tað pliktar seg til at rinda størri upphæddir enn tey inngoldnu tryggingargjaldini við rentu, vegna deyða áðrenn tryggjaði fyllir 8 ár.

Stk. 3. Eftirlitið kann loyva frávik frá reglunum í stk. 1-2.

§ 178. Áðrenn ein lívstryggingarsáttmáli verður gjørdur, og so leingi sum tryggingarsáttmálin gongur, skal tryggingarfelagið leggja fyri tryggingartakaranar slíkar upplýsingar um tryggingarfelagið og tryggingarsáttmálan, heruppí um kærumiðgerð og kærustovn, at tryggingartakarin fær nóg nógvar upplýsingar, soleiðis at hann skilir teir týðningarmiklastu partarnar í sáttmálanum.

Stk. 2. Eftirlitið áseetir nærri reglur um tær í stk. 1 nevndu upplýsingar.

§ 179. Er eitt lívstryggingarskjal burturmist, kann viðkomandi tryggingarfelag eftir áheitan frá tí, sum hevur prógvað sín rætt til tryggingarskjalið, við 6 mánaða ávaring boða handhavaranum at gera vart við seg. Boðini, ið verða givin við kunngering í tí í Føroyum til almennar lýsingar góðkenda blað, í fyrsta blaði í einum ársfjórðingi, skal hava eina nóg góða lýsing av tryggingarskjalinum, heruppí navnið á honum, á hvørs lív tryggingin er teknað.

Stk. 2. Ger eingin vart við seg innan freistin er úti, er tryggingarskjalið ógildugt, og felagið ger eitt nýtt tryggingarskjal til hansara, ið hevur biðið um, at boðini vórðu givin. Hann skal gjalda kostnaðin av boðunum.

Stk. 3. Ger onkur vart við seg eftir kunngeringina, og fæst ikki ein friðarlig skipan, kann eitt nýtt tryggingarskjal ikki verða skrivað, fyrr enn sínámillum returin av fráboðaðu krøvuntum er gjørdur av við dómi.

Stk. 4. Reglurnar í stk. 1-3 føra ikki við sær nakra skerjing í høvinum at royna at fáa lívstryggingarskjalið ógildað við dómi sambært lóggávunt um ógilding av virðisskjøtum.

§ 180. Eftirlitið kann áseta nærri reglur um innihaldið í vanligu tryggingartreytunum hjá lívstryggingarfeløgum.

Kapittul 28
Revsireglur v.m.

§ 181. Er harðari revsing ikki uppiborin sambært borgarligu revsilógini, verður revsað við bót brot á lógarinnar reglur um innsendan av fráboðanum, boðum og ársroknskapum til Eftirlitið ella lann føroyska skrásetingarmyndugleikan. Á samt hátt verða revsaðir stovnarar, nevndarlimir, stjórar og onnur starvsfólk, limir í umboðsnevndini, metingarmenn, ábyrgdarhavandi tryggingarfrøðingur, grannskoðarar, granskarar og avtøkustjórar og teirra varamenn, um teir uttan at hava rætt til tess lata viðari ella mistýta trúnaðarupplýsingar, sum teir í inningini av sínum starvi hava fingið kunnleika um. Vanligar upplýsingar um viðurskiftini hjá tryggingartakaranum kunnu verða latnar samtøkufyritøkum, jbr. orðaskiljingina í § 1, stk. 2, nr. 8 í ársroknskaparlógini, sum koma undir tagnarskyldu sum nevnt í 2. pkt., um hettaer vinnuliga grundað. Upplýsingar annars, heruppí upplýsingar um heilt privat viðurskifti, kunnu tó einans verða latnar viðari við samtykki tryggingartakarans. Starvsfólk í samtøkum, ið fáa tílíkar upplýsingar, koma undir ta í 2. pkt. nevndu tagnarskyldu.

Stk. 2. Á sama hátt verða teir í stk. 1 nevndu persónar revsaðir, um teir geva Eftirlitinum, ti føroyska skrásetingarmyndugleikanum ella øðrum almennum myndugleikum, nøkrum felagsmyndugleika, almenningínum ella tryggingartakarum skeivur ella villleiðandi upplýsingar, ella sum gera seg sekan í grovum ella oftari endurtiknum vansketni ella gáloysni, ið kann hava við sær tap fyri felagið ella tryggingartakaranar.

Stk. 3. Lata felagsins nevnd, stjórn, ábyrgdarhavandi tryggingarfrøðingur, grannskoðarar ella avtøkustjórar vera við rættstundis at gera tær skyldur, ið liggja á teimum sambært hesi lóg ella teimum sambært lógini givnu fyriskipanum, kann Eftirlitið sum tvingsilsmiðil áleggja viðkomandi dag- ella vikubøtur.

Stk. 4. Við bót verður eitt tryggingarfelag revsað, ið ikki lýður eini boð givin sambært § 7.

Stk. 5. Umboðsmenn ella onnur, ið vinnuliga virka fyri tekning av tryggingum, og sum í hesum nýta skeivar ella villleiðandi tilskilamir, verða revsað við bót ella hefti.

Stk. 6. Lýkur ein fyritøka sum nevnt í § 160, stk. 2, ikki tær skyldur, sum sambært hesi áseting áliggja fyritøkuni, kann Eftirlitið sum tvingsilsmiðil áleggja fyritøkuni sum slíkari ella teimum persónum, sum hava ábyrgdina av fyritøkuni dagligar ella vikuligar tvingsilsbøtur.

§ 182. Við bót verða revsað brot á § 4, § 9, stk. 7, § 12, §18, stk.3, § 23, stk. 1, 6 og 7, § 24, stk.1, § 37, §§ 38 og 39, § 40, stk. 2, § 41, § 53, stk. 2 og 3, § 58, stk. 1, §§ 59 og 60, § 62, stk. 1 og 3, § 63, § 65, § 68, §§69-71, § 74, § 80, stk. 1, § 81, § 82, stk. 1 og 3, § 107, stk. 4, § 112, stk. 2, 1. pkt., § 113, stk. 7, § 115, stk. 4, § 121, stk. 1, § 137, § 161, stk. 5-7 og § 178, stk. 1.

Stk. 2. Varðveitir eitt felag atgerðir gjørdar ímóti § 112, stk. 2, verður hetta revsað við bót.

Stk. 3. Brot á § 28 a, §§ 48 b - 48 e, § 48 h, §§ 53 - 55 a, § 69 a, § 111, § 115, stk. 1 og 2, § 115 a, § 116, stk. 4 og § 153 í partafelagslógini verða revsað við bót.

Stk. 4. Í fyriskipanum, sum Føroya Landsstýri ella Eftirlitið hevur givið sambært hesi lóg, kann verða ásett bótarábyrgd fyri brot á reglur í fyriskipanunum.

Stk. 5. Tá eitt partafelag, eitt smápartafelag, eitt sínámillum felag, ein eftirlønargrunnur ella líknandi ber seg at sum stovnari ella grannskoðari, kann verða álagt viðkomandi felag sum slíkum bótarábyrgd fyri brot á lógarinnar reglur.

§ 183. Er brot, sum nevnt í § 181 og § 182, stk. 1-4, framt av einum partafelag, smápartafelag, einum sínámillum felag, einum eftirlønargrunni ella líknandi, kann bótarábyrgd verða álagd felagnum sum slíkum fyri brot á lógarinnar reglur.

Kapittul 29
Gildiskomu- og skiftisreglur

§ 184. Lógin kemur í gildi 1. juli 1996.

Stk. 2. Samstundis fer úr gildi lóg nr. 155 frá 2. mai 1934 um skaðaryggingarvirksemi v.m., løgtingslóg nr. 24 frá 26. mars 1956 um tryggingarvirksemi, løgtingslóg nr. 61 frá 23. juni 1983 um broyting í løgtingslóg um tryggingarvirksemi og løgtingslóg nr. 48 frá 5. mai 1987 um broyting í løgtingslóg um tryggingarvirksemi.

Stk. 3. Føroya Landsstýri ásetir í kunngerð reglur um veitan av loyvi og um nær eitt felag, ið rekur tryggingarvirksemi, áðrenn henda lóg kemur í gildi, skal lúka krøvini í loyvinum

§ 185. Eru broytingar í viðtøkunum hjá tryggingarfeløgum, ella eftirlønargrunnum neyðugar sambært hesi lóg, skulu slíkar broytingar verða framdar innan 1_ ár eftir gildiskomu lógarinnar, um ikki Eftirlitið loyvir eina leingjan av freistini. Sama er galdandi fyri eftirlønargrunnar, sum higartil ikki hava verið undir eftirlitti, men sum henda lóg fevnir um.

Stk. 2. Skiftisreglur viðvíkjandi valskeiði v.m. fyri nevndar- og umboðslimir í teinnum feløgum, ið eru áðrenn henda lóg kemur í gildi, verður ásett í viðtøkunum.

Stk. 3. Verða ikki í stk. 1 nevndu viðtøkubroytingar ikki framdar innan freistin er úti, kann Føroya Landsstýri gera viðtøkurnar.

Viðmerkingar:

Landsstýrið setti í 1986 eina nevnd at kanna føroysku tryggingarlóggávuna og tryggingarviðurskiftini.

Í oktober 1989 sendi nevndin landsstýrinum eitt ávegis álit og vísti á 4 møguleikar at velja innillum viðvíkjandi broyting í tryggingarøkinum.

Møguleikarnir, ið vístir varð á, vóru besir:

Møguleiki I:	Frí kapping millum føroysk skrásett felag við føroyskum kapitali.
Møguleiki II:	Frí kapping millum núverandi tryggingardeildir í sambandinum.
Møguleiki III:	Núverandi bygnaður heldur fram.
Møguleiki IV:	Samanleggang av samtakintum til ein stovn.

Landsstýrið heitti í skrivi dagfest 1. mars 1990 á nevndina um at fáa at vita, hvønn møguleika nevndin mælti til at velja.

Í skrivi dagfest 9. juli 1990 mælti nevndin til at velja møguleika I: Frí kapping millum føroysk skrásett felag við føroyskum kapitali.

Í avtalum við ríkisstjórnina hevur landsstýrið bundið seg til at dagføra tryggingarlóggávuna og at leggja uppskot fyri løgtingið innan árið 1994 var úti.

Uppskot um nýggja løgtingslóg um tryggingarvirksemi varð lagt fyri løgtingið í seinastu tingsetuni 1993, men ikki avgreitt áðrenn val varð útskrivað. Uppskotið varð síðan dagført av arbeiðsbólkinum til kannan av tryggingarlóggávuni, og varð framlagt av nýggjum í seinastu tingsetu (løgtingsmál nr. 142/1994). Uppskotið varð beint í ídnaðarnevndina, sum skuldi viðgera málið sum millumtinganevnd. Eftir reglunum í nýggju stýrisskipanarlógini, er málið nú burturdottið.

Uppskotið hevur verið til ummælis hjá Tryggingarsambandinum Føroyar og deildunum í samtakinum og eru hesi ummæli hjáløgd.

Landsstýrið tekur undir við uppskotinum frá nevndini og leggur við hesum uppskotið við tilhoyrandi viðmerkingum fyri tingið.

1. viðgerð 17. oktober 1995. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 30. januar 1996 legði fram søljiðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 22. september 1995 og eftir 1. viðgerð 17. oktober 1995 beint í rættarnevndina.

Rættarnevndin hevur viðgjørt málið.

Nevndin staðfestir, at við hesum lógaruppskoti verður miðað ímóti at fremja viðfevnandi og grundleggjandi broytingar innan føroysku tryggingarlóggávuna.

Føroysk tryggingarlóggáva byggir í løtunt á rikislóg nr. 155 frá 2. mai 1934 og løgtingslóg nr. 24 frá 28. mars 1956.

Tað er sostatt ein reyndur lutur, at henda lóggávan nú er verðin bæði gomul og ótíðarhóskandi og tískil treingir til munandi ábøtur.

Verandi uppskot byggir í sini heild á danska tryggingarlóggávu, sum er nýtt sum fyrimynd fyri øllum tí sonevnda tekniska partinum av lógarverkinum.

Danska lóggávan tekur somuleiðis stoði í galdandi europeiskum rætti. Hetta er ein liður í miðvísu reyndunum at skapa rættareind innan hetta týðandi øki í teimum flestu vesturevropisku londunum.

Rættarnevndin hevur kannað avleiðingarnar av teimum grundleggjandi broytingum, sum ætlanin er at seta í verk við nýggju lóggávuni.

Í hesum viðfangi kann m.a. nevnast, at nøvnar reglur fyri umsiting av peningi eru settar í verk. Eisini verður sett í gildi tryggingarbólkaskipan við upphýti í serbólkar, sum t.d. brunatrygging, eftirlønargrunnur v.m. Krøvini til grundfæfeingi og gjaldførisbredda eru somuleiðis styrkt og útgreinað nærri.

Innførdar eru ávísar samtøkureglur, skipanir um ansni og varsemi hjá nevnd og stjórn, skipanir um starvsfólkaumboðan, stovnsetan av vfókaðum eftirliti, nýggjar felags- og rokniskaparreglur, umframt skipan av kærustovni.

Eisini kann nevnast, at reglurnar um lánveiting v.m. millum felog í somu samtøku eins og krøvini til innanhýsis grannskoðan eru skerpaðar í mun til verandi lóggávu.

Reglurnar um peningamillumgongufelog eru broyttar. Ásetti er, hvussu ein møguligur umskipan av sínámillum tryggingarfelogum kann fara fram, eins og hesi somu felog nú fáa møguleika við dótturfelogum at reka annað virksemi undir eftirliti.

Vegna tess, at íløgurnar samb. kap. 12 eru mannandi skerpaðar, er neyðugt hjá Tryggingarsamtakinum at fáa undantaksloyvi til innan eina rímuliga freist og at tillaga sínar íløgur til tey broytta krøvini.

Í § 75 er tí ásett, at Eftirlitið kann gera frávik frá reglunum í kap. 12. Møguleikin fyri undantaksloyvi skal sjálvsagt bert nýtast, tá íløgureglurnar føra til órímulig og óheppin úrslit, so sum hetta er tilskilað í viðmerkingunum til lógina.

Galdandi lóggáva á hesum øki fer úr gildi, tá henda lóg tekur við. Hesin dagur er samb. § 184, stk. 1, ásettur at vera 1. juli 1996.

Hetta kann kanska sýnast at vera nakað tepurt, tá hugsað verður um fylgilóggávu, kunngerðir, viðtøkur v.m., sum skulu setast í gildi. Rættarnevndin heldur tó, at hetta skuldi borið til, um farið verður í holt við hetta arbeiði, beinanvegin lógin er samtykt.

Undantikin gildiskomudagin er lógin um Føroya Lívstrygging. Henda lóggáva kann ikki fara úr gildi, fyrr enn onnur lóg, sum avloystir verandi lóg á hesum øki, verður sett í gildi.

Hetta hevur sína serligu orsøk í tí skipan, sum er galdandi um landskassaveðhald fyri Føroya Lívstrygging. Eftir kravi frá danska stjórnini skal hetta veðhald nú halda uppat fyri allar nýteknaðar lívstryggingar.

Undir slíkum fyritreytum kann Føroya Lívstrygging ikki halda fram á verandi grundarlag. Hesin stovnur má tískil fyribils rekast viðari sum sjálvstøðugt felag við gomlu tryggingunum, sum grundarlag, samstundis sum nýggjur stovnur verður skipaður sum partafelag ella sínámillumfelag, við neyðugum fæfeingi, sum Eftirlitið ásetir.

Neyðugt verður eisint, at broyta viðtøkurnar fyri Tryggingarsamtakið og laga hesar til nýggju lógina.

Eitt slík tillaging má neyvt ásetast í teimum nýggju viðtøkunum og verður tí skotið upp, at slíkar broytingar skulu verða framdar innan 1½ ár eftir gildiskomu lógarinnar, um ikki Eftirlitið loyvir eina leingjan av freistini, sbrt. § 185.

Á henda hátt skuldu stundir verið til á forsvarligum grundarlag at umskipað Tryggingarsamtakið til nýggju lóggávuna.

Fyri at lýsa málið nærri hevur rættarnevndin kallað inn umboð fyri tær ymsu deildirnar undir føroyska tryggingarsamtakinum, soleiðis at høvi var at fáa eina nærri frágreiðing um støðu teirra til lógaruppskotið.

Bæði einstøku deildarstjórarnir og nevndarformennirnir hava greitt nevndini frá sínu áskoðan í málinum og eru komnir við sínum tilmæli til ávísar nærri útgreinaðar spurningar, serstakliga viðvíkjandi teimum frávikum, sum teir halda vera neyðug at fremja við atliti til serføroysk viðurskifti.

Eisini hevur serfrøðinganevndin, sum hevur tilevnað uppskotið, umframt landsgrannskoðarin verið til hoyringar hjá nevndini.

At enda hava umboð fyri tryggingartakarafelagið havt høvi til at føra sínu sjónarmið fram.

Tá verandi uppskot, sum frammanfyri nevnt fyri stórsta partin viðkomandi hevur sítt útgangsstøði í danskum og europeiskum tryggingarrætti, og hesi viðurskifti frammanundan eru gjølliga viðgjørd, uttan at orsøk er til at fremja nakrar ítøkiligar broytingar, hevur nevndin fyrst og fremst miðað móti at viðgera tær reglur, sum eru merktar av lørvinum at tillaga lóggávuna til føroysk viðurskifti.

Ein týðandi broyting, sum skotið verður upp at fremja í mun til verandi lóggávu, er at víðka tryggingarøkið til í framtíðini at røkka út um Føroyar.

Verandi tryggingarlóg nr. 24 frá 28. mars 1956 avmarkar nevniligu virksøki hjá føroyska tryggingini til einans at fevna um Føroyar. T.v.s. at tað í løtuni ikki er gjørligt hjá einum føroyskum tryggingarfelag at

tekna tryggingar utanlands.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meirilutu og ein minnilutu.

Meirilutin (Bjørn á Heygum, Lasse Klein, Óli Breckmann, Ingeborg Vinter, Marita Petersen og Sune Jacobsen) kann taka undir við, at slíkar skerjingar **ikki** eru gagnligar og neyvan tena føroyskum áhugamálum.

Hesini verður metti skilagott at byggja inn reglurnar um eftirlønargrunnar í samlaða lógarverkið í staðin fyri at seta í gildi serstaka lóggávu hesum viðvíkjandi.

Hetta er ein positivur liður í arbeiðinum at einfaldgera lóggávuna soleiðis, at reglurnar verða meira atkomiligar og sumanhangandi.

Ein meirilutt í nevndini kann tí viðmæla hesum broytingum í § 1 í lógaruppskotinum.

Serstakliga hevur spurningurin um einkarrettin ella monopolið verið nógv viðgjørdur í nevndini.

Sumb. § 9 í uppskotinum verður mælt til at avtaka monopolið ogístaðin velja skipanina við fríari kapping millum føroyskt skrásett felløg við føroyskum kupitali.

Rættarnevndin kann staðfesta, at umboðini, sum hava verið til hoyringar, hava verið sera ymisk í máli hesum spurningi viðvíkjandi.

Umboðini fyri m.a. Føroya Brunatrygging, herundir bæði nevndarformaður og stjóri, hava ført fram, at tað er gagnligast fyri allar partar, bæði trygging, samfelag og tryggingartakara, at tryggingarmonopolið verður varðveitt.

Nevndarformennirnir fyri ávikavist Føroya Vanlukkutrygging og Tryggingarsambandinum Føroyar taka fult undir við hesum sjónarmiði.

Stjórarnir fyri ávikavíst Føroya Vanlukkutrygging, Føroya Livstrygging og Tryggingarsambandið vórtu harafturímóti av teirri áskoðan, at monopolið skuldi takast av.

Meirilutin í rættarnevndin heldur, at tíðin er farin frá einkarrettinum hjá tryggingini, og at nýggju tíðirnar krevja eina liberalisering av hesum reglum.

Meirilutin metir, at ein avtøka av einkarrettinum í longdini fer at tena øllum pørtum best, bæði tryggingarfelag og tryggingartakara.

Við eini kapping millum føroyskt skrásett felog fæst til vega ein tileggjan móti størri effektivisering, betri nýtslu av kapitaltilfeingi og arbeiðsorku og harvið øktum tænastustøði hjá tryggingarfelagnum, samstundis sum tryggingartakarin fær nakrar valmøguleikar, sum hann ikki hevur undir núverandi skipan.

Tá somuleiðis aftjóða gongdin innan hetta øki greitt bendir á eina støðugt økta liberalisering av tryggingarmarknaðinum, so er alt, sum talar fyri at avtaka einkarrettin, soleiðis sum hesin hevur verið galdandi í Føroyum síðan 1940.

Meirilutin í rættarnevndini hevur tó havt í huga, at tað er óheppið, at útlendsk reiðarí, sum skráseta skip sín undir Føroysku Altjóða Skipaskrásetingini (FAS), skulu verða noydd til at tekna trygging í Føroyum.

Talan er um eina sonevnda altjóða skipaskráseting. Í hesum viðfangi er umráðandi, at útlendingar, sum skráseta skip sín í Føroyum, hava mest møguligt frælsi, og at skipanin er "attraktiv". Bert á henda hátt kunnu vit menna um okkara kappingarføri og eggja fleiri reiðarum at koma hendan vegin.

Meirilutin mælir tí til, at § 9, stk. 4, verður broytt soleiðis, at krevið um, at allur tryggingarvirði verður tekn-

aður í føroyski skrásettum feløgum ikki er galdandi fyri skip skrásett undir FAS.

Viðvíkjandi spurninginum um, tað er gjørligt at fyrisita regluna um, at kappingin skal verða avmarkað til føroyskt skrásett feløg við føroyskum kapitali, so verður av sakkønum mett, at hetta letur seg gera við neyvum og skilagóðum eftirliti.

Nevndin hevur somuleiðis umrøtt spurningin, um tað er rætt, at tað er landsstýrið sum politiskur myndugleiki, ið gevur "koncessión" til tryggingarvirksemi í Føroyum í staðin fyri sum aðrar staðir, at hetta er ein umsitingarligur myndugleiki, sum ger hetta út frá reinum formligum førleikatreytum.

Sjálvt um tað grundleggjandi er beint at halda seg til lógásettar førleikatreytir, so metir meirilutin í nevndini, at tað er ov tíðliga um at taka eitt slíkt stig fult út, og verður tí mælt til, at tann í uppskotinum nevnda skipan fyribils verður varðveitt.

Viðvíkjandi eftirlitinum, so verður í viðmerkingunum skotið upp, at stovnsett verður eitt eftirlit, sum skal virka undir Landsgrannskoðaranum.

Hetta verður gjørt út frá teirri sannroynd, at forført verður at skipa eitt sjálvstøðugt eftirlit í egnum hølum og við egnum starvsfólki í Føroyum, tá hetta er rentiliga orkukrevjandi og hitfalsliga kostnaðarmikið.

Landsgrannskoðarin hevur ført síni sjónarmið fram í hesum máli og heldur ikki, at hetta er nøkur skynsom loysn.

Eftir hansara tykki ert tað neyvan nøkur loysn at húsast undir sama lon ella at troyta sama arbeiðsorku, tá hetta bert kann virka órógvandi.

Meirilutin í nevndini ásannar, at tá Landsgrannskoðarin ikki tekur undir við hesum hugskoti, sum skotið er upp í viðmerkingunum, so má ein onnur loysn finnast.

Mælt verður til, at Landsstýrið finnur fram til eina loysn í samráð við meginfyrtsitingina.

Viðvíkjandi kærumøguleikunum, so verður skotið upp, at vit nýta dansku stovnarnar á hesum øki undir Ídnaðarmálaráðnum.

Meirilutin í nevndini metir hetta at vera eina skilagóða loysn, tá vit í Føroyum ikki hava neyðugan førleika ella orku til at átaka okkum eina slíka uppgávu.

Felagið fyri tryggingartakarar hevur ført fram, at tað er av alstórum týdningi, at tryggingartakarin hevur ein fyrisitingarligan kærumøguleika, í staðin fyri at skula verða noyddur at venda sær til rættin í hvørjum einstøkum føri.

Nevndin hevur kannað henda spurning nærri og kann staðfesta, at ein avtala er um at koma í lag við danska "ankenævnet for forsikring", sum hervið átekur sær eisini at viðgera kærur frá føroyskum tryggingartakarum.

Tá ein slíkur kærustovnur ikki er lógarfestur hvørki í Danmark ella í Føroyum, verður tildið, at hetta er ein nøktandi tiltak, sum kann hjálpa føroysku tryggingartakarunum utan alt ov stórar umsitingarligar útreiðslur.

Viðvíkjandi spurninginum um stovnseting av tryggingarráði, so hevur arbeiðsbólkurin mælt til, at landsstýrið ger avtalu við Ídnaðarmálaráðið um, at tað danska tryggingarráðið virkar sum tryggingarráð viðv. tryggingarmálum úr Føroyum.

Hetta verður gjørt út frá tí sannroynd, at tað neyvan finst serkunnleiki í Føroyum til at manna eitt slíkt tryggingarráð, eins og arbeiðsuppgávurnar ivaleyst verða avmarkaðar.

Meirilutin í rættarnevndini kann taka undir við nevndu sjónarmiðum um at skipa eitt samstarv við danska

tryggingarráðið. Hetta er ivaleyst gagnligasta loysnin á hesum spurningi undir verandi fortreytum, samstundis sum møguleikin fyri at skipa eitt tílíkt ráð í Føroyum framhaldandi verður varðveittur, um tørvur skuldi verið á hesum.

Út frá tí, ið her er ført fram, ásannar meirilutin, at stórur tørvur er á at fremja minandi broytingar í føroysku tryggingarlóggávuni, um hon skal liva upp til nútímans krøv og koma upp á sama støði sum í grannalondum okkara.

Meirilutin í nevndini kann á hesum grundarlag taka undir við, at nýggj lóggáva innan tryggingarøkið verður sett í gildi fyri Føroyar.

Meirilutin (Bjørn á Heygum, Lasse Klein, Óli Breckmann, Ingeborg Vinter, Marita Petersen, Sune Jacobsen) mælir hervið løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins við hesi broyting:

B r o y t i n g a r u p p s k o t
til
uppskot landsstýrisins

§ 9, stk. 4, verður orðað soleiðis:
"Føst ogn, skip, motorakfør, lógbodnar tryggingar, lívstryggingar, eftirlønargrunnar sambært kapitli 21 og 22, og annar tryggingarvarur váði í Føroyum, ið er knýttur at føroyskum áhugamálum, kann ikki verða tryggjaður aðrastaðni, men einans í teimum stk. 1 og 2 nevndu feløgum, tó við undantaki av tryggingarváða av skipum, við tilhoyrandi manning, útgerð og reiðskapi, sum eru skrásett undir FAS-skipanini og teimum undantøkum, sum fylgja av § 1, stk. 2."

Minnilutin (Heini O. Heinesen) kann ikki taka undir við landsstýrinum, tá mælt verður til at sundurluta tryggingarsamtakið í Føroyum. Heldur átti landsstýrið at valt, møguleika IV: Samanlegging av samtakinum til ein stovn. Eftir øllum tí, sum er komið fram seinastu árini, ganga ikki nógv ár, til vit í samhand við millumtjóða avtalur verða noyddir inn í kapping á altjóða støði. Samanlegging hevði eisini styrkt um tryggingarsamtakið í Føroyum. Herafturat kemur, at tað verður bíligari at endurtryggja í útlandinum.

Fyriliggjandi lógaruppskot er sambært tí, sum kanningarhólkurin sigur, ætlað til fría kapping á altjóða støði. Tað er til hesa kapping, vit eiga at fyrirelka okkum. Hinvegin kann minnilutin taka undir við, at verandi lóggáva er ótíðarhóskandi, og neyðugt er við nýggjari lóggávu.

Tá meirilutin førir fram, at rættarnevndin neyvt hevur kannað avleiðingarnar av teimum grundleggjandi broytingunum, sum ætlanin er at seta í verk við nýggju lóggávuni, samsvarar hetta ikki veruleikanum.

Landsstýrið sigur í sínum uppskoti, at kongstankin í uppskotinum er at avtaka tryggingarmonopolið, her heldur minnilutin, at farið verður úr øskuni í eldin, tí farið verður frá formligum monopoli til marknaðarmonopol.

Um valdur verður møguleiki 1: Frí kapping millum føroysk skrásett feløg við føroyskum kapitali, er tað lítið hugsandi, at lógartekstur beinleiðis umsettur úr donsku lógini um tryggingarvirksemi er hóskandi til føroysk viðurskifti. Løgfrøðiliga sæð, er tað sera lítið samforandi, at tillagaður lógartekstur úr danskari lóggávu, sum aftur er tillaging til EU-reglur, og sum er ætlað til fría kapping við grundarlagi í 463 mió. íbúgvum, skal vera hóskandi fyri marknað við 43.000 fólkum.

Tann 17. apríl 1986 samtykli løgtingið við 30-0 atkvøðum soljóðandi uppskot: "Álagt verður landsstýrinum at leggja fyri ólavsøkutingið komandi uppskot til nýggja endurskoðaða lóggávu um tryggingarsamtakið í Føroyum."

Hóast hesa løgtingssamtykt hevur landsstýrið fyri 3. ferð lagt uppskot fyri løgtingið um at spjaða trygging arsamtakið í Føroyum við eini umbering um, at danska ríkisstjórnin hevur sett hetta sum krav í sambandi við avtalurnar millum ríkispartarnar. Í umrøddu avtalu, t.v.s. í "Erklæring fra Færøernes Landsstyre" frá 1. februar 1993 stendur at lesa, at "inden udgangen af 1993 fremlægges forslag til modernisering af den færøske lovgivning om forsikringsvirksomhed." Minnilutin heldur, at kravið um nýmótansgerð av tryggingarlóggávuni kann fremjast uttan at sundurluta føroyska trygging.

Sambært § 9 í uppskotinum letur løgtingið landsstýrinum upp í hendi at reka konsessiónspolitikk innan tryggingarvirksemi. Løgtingið fær soleiðis onga ávirkan á, hvussu landsstýrið umsitur hesa heimild. Málið er alt ov álvarsamt til, at skiftandi samgongur antin reka liberalan ella strangan konsessiónspolitikk, tí tryggingarvirksemi krevur langa tíð til uppbygging, meðan skjótt er at oyðileggja sjálvt eitt vælvirkandi felag.

Tað ørkymlar minnilutan almikið, at meirilutin í sínum áliti mælir til, at tann kanska týdnmingarmesti "stovnurin" í uppskotinum, nevniliga eftirlitið sambært kap. 25, (citat):

> "Landsstýrið finnur fram til eina loysn í samráð við meginfyrisitingina soleiðis, at eitt skrivstovufólk eisini hevur um hendi uppgávurnar við at taka móti posti, telefon v.m. umframt at skipa fyri fundum í Eftirlitinum og annars taka sær av tí praktiska arbeiðinum fyri ávísa samsýning."

Upprunalógaruppskotið frá kanningarbólkinum byggir á eitt neyvt eftirlit. Fyriliggjandi lógaruppskot, sum meirilutin mælir løgtinginum til at samtykkja uttan broytingar, er fyri so vítt sama uppskot.

Í teimum 185 greinunum í uppskotinum verður "Eftirlitið" nevnd omanfyri 300 ferðir, tað kann tí tykjast løgið, at lógaruppskotið ikki tørvar broyting, tá ið meirilutin skjýtur upp eitt tílíkt "upp á gjøt"-eftirlit, sum skal tryggja álitið á virksemið bæði inn- og úteftir.

Tá ið meirlutin vísir á, at veðhaldið til Føroya Lívstrygging má detta burtur eftir kravi frá donsku stjórnini, so er hetta ein spurningur, sum løgtingið eigur at umhugsa av nýggjum, tí av øllum givnum veðhaldum, man hetta vera tað minst vandamikla fyri landskassan. Hetta, tí at allar útgjaldingar frá F.L. veita eina skattainntøku upp á 35 - 40%. Illa er hugsandi, at veðhaldið verður vandamikið fyri landskassan, uttan so at meiningsleyst verður at búleikast í Føroyum. Verður veðhaldið avtikið, verður F.L. ikki lív lagað, tí afturtøkan í sjálvum sær framskundar, at fyritøkan doyr. Hetta viðførir, at eingin nýggj lívstrygging verður stovnað, og vandi er fyri, at føroyingar fara at tekna lívs- og kapitalstryggingar uttanlands.

Minnilutin heldur tað vera sera løgið at avtaka landskassaveðhaldið til Føroya Lívstrygging samstundis, sum landsstýrið hevur skotið 2,7 milliardir inn í Føroya Banka, sum er tann mest hugsandi kappingarneytin hjá Lívstryggingini í Føroyum.

Minnilutin er sera ivasamur um eitt sundurlutað tryggingarsamtak lýkur solvenskravið í lógaruppskotinum. Tað er í nærliggjandi at hugsa sær, at tað sama, sum hendi við bankavirkseminum í Føroyum, fer at henda innan tryggingarvirksemið. Vit fáa eitt styrkt monopol, um tað ikki verður frí kapping á altjóðastøði.

Niðurstøðan av at mæla til sundurluting av tryggingarsamtakinum í Føroyum, verður, at føroysk trygging ikki kemur at yvirliva í kappingini á altjóðastøði. Tað er tí umráðandi at fyriteika okkum til hesa kapping. Hetta gerst best við at styrkja um Tryggingarsamtakið, heldur samanlegging enn sundurluting, tí kappingin verður hørð.

2. viðgerð 2. februar 1996. Broytingaruppskot frá meirilutanum í rættarnevndini til § 9 samtykt við 18-3-1 atkvøðum. § 9 soleiðis broytt samtykt við 19-4-0 atkvøðum. Samtykt at beina málið soleiðis broytt til 2. viðgerð við 20-2-1 atkvøðum.

7. februar 1996 legði ein sumd rættarnevnd fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

3. viðgerð av tingnáli nr. 5/95: Tryggingarlóggávan.

Eftir 2. viðgerð 2. februar 1996 hevur rættarnevndin lingið áheitanir viðv. gildiskomuregluni í nevnda lógaruppskoti.

Sambært uppskotinum § 184 kemur lógin í gildi 1. juli 1996.

Í teimum áheitanum, rættarnevndin hevur fingið, verður ávikavist av Føroya landsstýri og av Føroya Sjóvátrygging vist á:

at um lógin kemur í gildi 1. juli 1996, verður av stutt skotbráð til tess at fylgilógin kann verða gjørd,

og

at tað er sera óluppað, at lógarbroyting fer fram miðskeiðis í einum ári. Vist verður her til § 9, stk. 4 í lógaruppskotinum.

Vi tað, at rættarnevndin tekur undir við teimum áskoðununum, sum eru komnar fram, síðan málið varð til 2. viðgerð, setir **ein samd rættarnevnd** fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

Í § 184, stk. 1 verður "1. juli 1996" broytt til: "1. januar 1997".

3. viðgerð 7. februar 1996. Broytingaruppskot frá samdari rættarnevnd til § 184 samtykt við 26-2-0 atkvøðum. Uppskotið sum samtykt við 2. viðgerð og broytt við 3. viðgerð endaliga samtykt við 25-1-2 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 3 frá 13. februar 1996.

FL jnr. 617-6/91.

6 Europasáttmáli um fyribyrging av torturi v.m.

Ár 1995, leygardagin 30. september legði Ivan Johannesen, landsstýrismaður, vegna lógnum, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

s a m t y k t a r

Løgtingið góðkennir, at kunngerð av "Europaråds-konvention af 26. marts 1987 til forebyggelse af tortur og unmenneskelig eller vanærende behandling eller straf" verður lýst at galda í Føroyum.

Viðmerkingar:

Eftir millumlandasáttmálanum verða framdar fleiri eftirlitsskipanir, sum hava til endamáls at fyribyrgja brot á bannið móti tortur og ómenniskjaligari ella vanærandi viðferð ella revsing í mannarettindarsáttmálanum frá 4. november 1950 til verju av mannarettindum og grundleggjandi frælsisrettindum.

Eftirlitsskipaninar verða framdar fyri at hjálpa einum persónshólki, ið ein veit ofta eru fyri ágangi av omanfyri nevnda slagi, nevniliga persónar, ið eru fongsladir ella á annan hátt hava nátt sítt frælsi. Eftir sáttmálanum verður sett ein millumlanda nevnd, hvørs limir undir vitjanum í linalondunum skulu eftirkanna, at bannið móti torturi verður hildið. Frágreiðing verður skrivað frá hvørjari vitjan og í frágreiðingini skulu myndugleikarnir í avvarðandi landi verða kunnaðir um møgulig viðurskifti, sum eftir nevndarinnar meting eiga at verða broytt.

Sáttmálalondini skulu geva nevndini atgongd til landaøki sínt og annars viðvirka til, at vitjanir hjá nevndini kunnu fara fram.

Mannarættindarsáttmálin frá 4. november 1950 við uppískoytum er lýstur at galda í Føroyum.

1. viðgerð 17. oktober 1995. Málið varð beint í rettarnevndina, sum 22. november 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 30. september 1995 og eftir 1. viðgerð 17. oktober 1995 beint í rættarnevndina.

Ein samd nevnd mælir til at samtykkja, at Europasáttmálin um fyribyrging av torturi v.m. verður settur í gildi fyri Føroyar.

2. viðgerð 27. november 1995. Málið endaligu samtykt við 25-0-0 atkvøðum.

F.L.j.nr. 65-1/90.

7 Setan av nevnd at gera uppskot til nýggja kommunala skipan

Ár 1995, leygardagin 30. september 1995 legði Ivan Johannesen, landsstýrismaður vegna Eilif Samuelsen, landsstýrismann, fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið tekur undir við, at sett verður ein nevnd – kommununevnd – at gera uppskot til nýggja kommununskipan. Uppskotið verður gjørt við støði í teimum høvuðssjónarmiðum, sum ganga fram av uppskoti til kommissorium, sum er lagt við sum skjal til løgtingsmálið.

Viðmerkingar:

Hetta málið varð lagt fram av landsstýrinum 20. apríl 1995, løgtingsmál nr. 132/1994. Málið varð eftir

fyrstu viðgerð beint í rettarnevndina. Rettarnevndin legði fram álit, og mælti ein meiriluti í nevndini tinginum til at heina málið aftur í rettarnevndina, og at rettarnevndin varð millumtinganevnd at viðgera málið og leggja fram nýtt álit í málinum í seinasta lagi 1. oktober 1995. Uppá fyrispurning hevur logtingsformaðurin upplýst, at rettarnevndin ikki leggur fram nýtt álit í málinum, tí eftir § 15 í nýggju stýrisskipanarlógini falla burtur øll mál, sum ikki eru endaliga avgreidd tá tingsetan endar. Við hesum verður málið lagt fram aftur óbroytt.

Í samgonguskjalinum er avtalað, at broytingar skulu gerast í kommunuskipanini, bæði viðvíkjandi uppgávu- og ábyrgdarbýtinum millum land og kommunur og viðvíkjandi kommunuupplýtinum.

Landsstýrið heitti tí í oktober 1994 á nokur embætisfólk í landsumsitingini um samsvarandi samgonguskjalinum at gera uppskot til landsstýrið um kommissorium fyri eina kommununevnd at gera uppskot um eina nýggja kommunala skipan.

Embætisbólkurin hevur nú gjørt uppskotið, sum er hjálagt, og hevur samstundis gjørt eitt upprit (hjálagt) í sambandi við uppskotið til kommissorium. Uppskotið til kommissorium og uppritið er við skrivi dagfest 14. februar 1995 frá embætisbólkinum latið landsstýrinum.

Av tí at talan er um umfatandi broytingar, sum skulu gerast í kommunuskipanini, og harvið eisini einum stórum parti av allari almennari fyrisiting í Føroyum, hevur landsstýrið gjørt av at leggja málið fyri løgtingið til eitt opið og fordómsfrítt orðaskifti.

Tað er landsstýrinum greitt, at hetta á mangan hátt er eitt sera viðbrekið mál, og eitt mál av tílíkum slag, har tinglimir í sínu støðutaki ikki nýtast at kenna, at teir eru bundnir at vanligum fyriliti til partapolitikk.

Høvuðstrupulleikarnir við verandi kommunuskipan er samanblandingin av avgerðar- og ábyrgdarøkinum hjá ávikavist landsmyndugleikum og kommunalum myndugleikum, sum kemst av, at kommununar eru ov smáar at loysa kommunalu uppgávurnar uttan stuðul frá landsmyndugleikum/landskassa. Hetta ger, at kommununar sjálvar lítið ella einki veruligt vald hava á teimum kommunalu uppgávunum, og at fíggjarligu avleiðingarnar og ábyrgdin av uppgávunum ikki verða staðfestar nóg vel og nóg skjótt.

Høvuðsendamálið við at umleggja kommunuskipanina er at styrkja kommunala sjálvræðið og ábyrgdina soleiðis, at tær kommunalu uppgávurnar kunnu verða loystar skilabetri og búskaparliga meira forsvarligt.

Kommunalu uppgávurnar eiga at tillagast fíggjarliga orkuni hjá kommununum, og m.a. tí er neyðugt, at avgerðarmyndugleikin og ábyrgdin eru á einum og sama stað, og ikki, sum nú, bæði hjá landsmyndugleikum og kommunalum myndugleikum.

Skulu kommununar hava veruligan avgerðarætt og veruliga ábyrgd fyri kommunalu uppgávunum, er neyðugt, at kommununar við eini heildarvelting fíggjarliga eru fatar fyri at fera uppgávurnar sjálvar, uttan at neyðugt er at leita sær hjálp uttanfyri kommununmark, hjá landsmyndugleikum ella øðrum kommununum. Fíggjarligu grundarlagið hjá kommununum má tí styrkjast, m.a. við at kommununar verða lagdar saman í størri eindir.

Landsstýrið metur tí, eins og nevnt er í uppritinum, at í veruleikanum eru bert tveir vegir at fara:

1. Fleiri av uppgávunum, sum nú eru kommunalar, verða tiknar frá kommununum og lagdar til landsmyndugleikar at umsita.

2. Kommununar verða lagdar saman í størri eindir, so kommununar kunnu taka ta fullu ábyrgdina av uppgávunum, sum nú eitast at vera kommunalar, og við moguleika at yvirtaka øðrar uppgávur, sum landsmyndugleikarnir nú umsita.

Eftir uppskotinum til kommissorium, skal kommununevndin, sum setast skal, gera uppskot um nýggja kommunuskipan, ið fevnir um: nýtt kommunuupplýti, nýtt uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur, heruppí nýggja stuðulsskipan frá landskassanum til kommununar.

Fyrr enn kommununevndin hevur gjørt sítt arbeiði, ber sjálvandi ikki til at sigja neyvt, hvussu ein nýggj kommununskipan fer at síggja út, hvussu nógvar kommununar verða og hvussu geografiska uppbýtið verður, hvørjar uppgávur tær skulu hava, og hvussu fíggingin og stýrisskipanin skal verða. Men verður hetta uppskotið samtykt, og verða kommununtar lagdar saman eftir teimum meginreglum, sum nevndar eru í hesum uppskotinum til kommissorium, verða høvuðsbroytingarnar í kommununskipanini hesar:

Kommununupphýtið.
Talið á kommununum verður skorið niður úr 50 til í mesta lagi 10.

Uppgávur.
Avgerðarrætturin og meðábyrgdin hjá landsmyndugleikum og/ella kommunalum samstarvum fyri, hvussu kommunalu uppgávurnar verða loystar, t.d. viðvíkjandi bygging av havnum og skúlum, verður flutur/flutt til tær einstøku kommununar, og møguleiki verður fyri at leggja fleiri uppgávur til kommununar.

Fígging.
Prosentvísa endurgjaldið úr landskassanum til kommununar verður avtikið, og í staðin fyri fáa kommununar eina heildarveiting.

Skuldartrupulleikin.
Í sambandi við eina samanlegging er hetta ein serligur trupulleiki, og kommununevndin skal tí eisini kanna og koma við tilmæli um, hvussu ein skiftisskipan kann gerast, soleiðis, at ein samanlegging ikki fer at kennast fíggjarliga órímilig.

Bygdirnar.
Landsstýrið ásannar serligu viðurskiftini hjá bygdunum, og at tær bygdirnar, sum hava kommunt fyri seg, í ein ávísan mun av røttum kunnu óttast fyri, at tær við eini samanlegging við aðrar stórri kommununir verða við skerdan hat. Kommununevndin skal tí kanna og koma við tilmæli um, hvønn leikin bygdirnar kunnu fáa í eini nýggjari skipan.

Framferðarháttur við kommununsamanleggingum.
Eftir galdandi lóggávu er bert heimild til sjálvboðna kommununsamanlegging, og hetta er eisini útgangsstoðið fyri tí arbeiðinum, sum nú verður gjørt. Samanleggingarnar fara fram eftir tí ætlan, sum landsstýrið og løgting hava samtykt eftir tilmæli frá kommununevndini.

Kommununevndin skal umbugsa at gera eina serliga samanleggingarkíg um, hvussu fram skal farast, tá kommununir verða lagdar saman.

Nevndararbeiðið.
Nevndararbeiðið fer fram eftir fastari arbeiðsætlan, sum er býtt upp í tættir, og skal nevndin lata ávegis álit frá sær, so hvørt sum partar av arbeiðinum eru loknir. Ávegis og endaligt álit verða send til ummælis til kommununar ella møguliga til ein serligan bólk av kommunupolitikarum og landspolitikarum, sum setast kann í hesum sambandinum.

Tá uppskotið varð lagt fram fyrru ferð, varð roknað við, at nevndin kundi lata álit frá sær síðst í 1996. Nú má heldur roknast við, at nevndin kann lata álit frá sær miðskeiðis ella síðst í 1997.

L. viðgerð 17. oktober 1995. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 1. desembur 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 30.09.95 og varð eftir L. viðgerð tann 17.10.95 beint í rættarnevnd

ina.
Rættarnevndin hevur viðgjørt málið, og kann við ávísum undantøkum taka undir við grundtegjunum í verandi uppskoti til kommissorium.

Eftir nærri gjøgnumgongd og við støði í teimum upplýsingum, sum fingnar eru til vega frá m.a. frá sakkønum og umboðum fyri kommunurnar, mælir rættarnevndin til, at niðanfyri tilskilaðu broytingar verða framdar í arbeiðssetninginum hjá nevndini.

Mælt verður til, at undir A, pkt 5, verður gjørt ískoyti, har álagt verður nevndini, somuleiðis at greina út, hvørjar uppgávur kunnu leggjast út til kommununar í mun til nøkur nærri tilskilað alternativ íbúgvaratøl/stødd av kommunalu eindunum.

Mett verður, at tað er av stórum týdningi at fáa eina útgreining av, hvørjar uppgávur kunnu røkjast og fyrisitast av kommununum alt eftir stødd/íbúgvaratali, og á henda hátt finna fram til nakrar valmøguleikar millum ymiskar hóskandi eindir, sen í mun til eitt forsvarligt og skynsamt uppgávubýti millum land og kommunur.

Somuleiðis verður mælt til, at undir A, pkt. 6, verður gjørt ískoyti, har álagt verður nevndini at greina út, um heildarveitingar/útjavningarskipan ella aðrar skipanir kunnu nýtast í fíggjarliga samskiftinum millum land og kommunur.

Rættarnevndin er av teirri áskoðan, at eingin orsøk er til frammanundan at koma við tilmæli um og harvið binda seg til at taka útgangsstøði í eini heildarveitingar/útjavningarskipan í einum nýggjum kommunalum bygnaði.

Hildið verður, at tað er skilagott og lættir um viðgerðina av málinum at fáa eina meira rúma frágreiðing við eini gjøgnumgongd av ymsum valmøguleikum, og um hesar skipanir í heila tikið eiga at verða settar í verk sum partur av fíggjarliga samskiftinum millum land og kommunur og millum kommunur innanhýsis.

Undir B pkt. 1 hevur nevndin gjørt tað týðandi broyting, at leggja støðið fyri stødd/tal av kommunum grundað á tær uppgávur, sum myndugleikarnir ynskja lagdar út at fyrisita lokalt, og ikki øvugt, har uppgávurnar verða lagaðar eftir tali/stødd á kommununum. Eisini er umráðandi, at tikið verður støði í einum meira greiðum uppgávu/ábyrgdarbýti millum land og kommunur í hesum viðfangi.

Rættarnevndin metir somuleiðis, at tað er umráðandi, at hædd verður tikin fyri teimum heilt serstøku viðurskiftunum, sum eru galdandi úti á smáuyggjunum í Føroyum. Talan er um, smábygdasamfeløg, sum fyri tað fyrsta eru nettiliga avbyrgd frá restini av landinum, umframt at ferðasambandið mangan er sera vánaligt.

Við støði í hesum veruleika eigur at vera umhugsað at seta møguligar serskipanir í verk fyri henda partin av landinum.

Rættarnevndin mælir tí til, at B, pkt. 3, í uppskotinum til kommissorium verður orðað soleiðis:

"Møguligar serskipanir viðvíkjandi útoyggjunum verða at grunda á serstøku viðurskiftini, sum har eru galdandi."

Eisini er tað ein sannroynd, at smáu bygdirnar í Føroyum eru eitt fyribrigdi fyri seg sjálvan við sínum heilt sermerktu eyðkennum.

Øll eru samd um, at tað er umráðandi, at hesar eisini framhaldandi fáa loyvi til at varðveita sín samleika, sum partur av føroysku søgu- og mentannararvinum.

Rættarnevndin mælir tí til, at B, pkt. 4, verður orðað soleiðis:

"Møguligar serskipanir fyri tey smærru bygdasamfeløgini verða gjørdar soleiðis, at tey í mest møguligan mun varðveita síni eyðkenni."

Onnur broyting, sum rættarnevndin metir at hava alstóran týdning, er, at høvuðssjónarmiðið og meginreglan fyri arbeiðinum skulu vera, at broytingar í kommunuskipanini skulu byggja á sjálvbodna samanlegging og ikki tvingsil.

Umráðandi er at skapa undirtøku og gróðrarbotu fyri ætlaðu broytingunum. Rættarnevndin er samd um, at hetta gerst best á sjálvbodnum grundarlagi.

Mælt verður tí til, at D. pkt. 1. verður orðað soleiðis:

"Broytingar í kommunuskipanini skulu byggja á sjálvbodna samanlegging."

Rættarnevndin hevur í hesum sambandi eisini viðgjørt spurningin um samanlegging eftir galdandi lóg.

Nevndin staðfestir, at hesin møguleiki er til staðar í galdandi lóggávu, og kann fremjast á sjálvbodnum grundarlag við góðkenning landsstýrisins.

Viðvíkjandi nevndarsamansetingini, so er rættarnevndin av teirri áskoðan, at kommunurnar eiga at verða betri umboðaðar, og tískil skulu fáa ein fint afturat í kommununevndina. Tá trý umboð verða fyri kommunurnar og trý umboð fyri meginfyrisitingina, so skapar hetta eisini eina natúrliga javnvág millum tveir partar við til tíðir ymsum áskoðanum á hesum øki.

Mett verður, at rættartrygd og tjóðbúskaparlig stýring eru slík sjálvsøgd viðurskifti, at óneyðugt er at taka hesi við sum sjálvstøðugt pkt. í arbeiðssetninginum hjá nevndini.

Við hesum viðmerkingum setir rættarnevndin (Bjørn á Heygum, Sune Jacobsen, Marita Petersen, Ingeborg Vinther, Bjarni Djurholm, Lasse Klein og Signar á Brúnni) fram soljóðandi uppskot til kommissorium til samtyktar:

U P P S K O T

til

KOMMISSORIUM FYRI KOMMUNUNEVNDINA

A Við atliti til núverandi kommunuskipan verður álagt nevndini:

1. At lýsa búskaparliga grundarlagið hjá kommununum.
2. At lýsa demografisku og geografisku viðurskiftini.
3. At greina út formligu og óformligu viðurskiftini millum land og kommunu, t.e.m.a. uppgávu- og ábyrgdarbýtið og fíggjarlig viðurskifti.
4. At greina út umsitingarligu viðurskiftini, undir kommunalt samstarv.
5. At greina út hvørjar uppgávur kunnu leggjast út til kommunurnar í mun til nokur nærri tilskilað alternativ tbúgvaratøl í teimum einstøku kommunalu eindunum.
6. At greina út um heildarveitingar/útjavningarskipan, ella aðrar skipanir kunnu nýtast í fíggjarliga samskiftinum millum land og kommunur.

B Nevndin skal koma við tilmæli um:

1. Hvørjar uppgávur hóskandi kunnu umsitast av kommunalu eindunum við støði í einum meira greiðum uppgávuhýti millum land og kommunur.

2. Hóskandi tal og stødd av kommunum við støði í B 1.

3. Møguligar serskipanir viðvíkjandi útoyggjunum verða at grunda á serstøku viðurskiftini, sum har eru galdandi.

4. Møguligar serskipanir fyri tey smærru bygdasamfeløgini verða gjørdar soleiðis, at tey í mest møguligan mun varðveita síni eyðkenni.

C Harafturat skal nevndin koma við tilmæli um neyðugar broytingar í ávísum formligum viðurskiftum:

1. Kommunulógin skal eftirkannast í síni heild, t.v.s. dagførast og gerast greiðari.

2. Reglur um fíggjarstýring, t.e. fíggjarætlan, bókhald, roknskaparviðurskifti, reglur um lántøku og veðhaldsbindingar.

3. Avmarkingar mótvegis privata vinnulívinum.

4. Ásetingar um kommunalt samstarv.

5. Vísa á neyðugar broytingar í serlóggávuni.

D Høvðussjónarmiðini og meginreglurnar í arbeiðinum hjá nevndini skal vera:

1. Broytingar í kommunuskipanini skulu byggja á sjálvbodna samanlegging.

2. Fíggjarlig ábyrgd fylgir avgerðarrættinum.

3. Uppgávurnar verða loystar samfelagsbúskaparliga ráðiliga, men so nær borgarum sum tilber.

4. Borgararnir fáa greiða fatan av kostnaðinum av virkseminum hjá kommununi.

Limir í kommununevndina:

3 limir frá bý/bygdaráðum
3 limir frá umsitingini
1 skrivara

Umboð kristiliga fólkafloksins Lasse Klein tekur undir við høvuðssjónarmiðum meirilutans, men hevur hesar viðmerkingar til uppskotið:

Umboð KrF's er samdur við meirilutanum í, at møguleiki fyri kommunusamanlegging er til staðar í galdandi lóggávu, men nýggj dømir eru um, at hóast kommunur hava ynski um at fremja samanlegging á sjálvbodnum grundarlagi, so hevur landsstýrið kortmi steðgað eini og hvørjari roynd at fremja samarbeiði og samanlegging í verki og tí verður hildið rættast at skoyta uppí punkt D, eitt nýtt punkt 5.

Hóast ein og hvør samanlegging og samarbeiði skal hava landsstýrisins góðkenning, so metir Lasse Klein rættast vera, at kommunurnar í hesum tíðarskeiði, nevndararbeiðið fevnir um, so nógvar sum gjørligt sjálvbodnar taka stig til samanlegging og samarbeiði og skal landsstýrið sum eitt úrslit av hesum góðkenna eina og hvørja roynd hjá kommununum, sum sjálvbodnar taka stig til samanlegging og er hetta eisini í tráð við samgonguskjalið hjá samgonguni.

Sambært uppskotinum hjá landsstýrinum, skulu kommunurnar aftaná, at arbeiðið er tiðugt leggja saman í størri eindir, og finna tær sjálvar ikki út av tí, so fara royndir at verða gjørdar at tvinga kommunur til sam-

anlegging. Sambært uppskotinum er talan um 7-10 kommunur. Hetta metir Lasse Klein vera óheppið og at møguleikar eiga at verða givnir kommununum sjálvar at gera samstarvsavtalur bæði áðrenn og aftaná, at arbeiðið er liðugt og tí verður sett fram eitt uppískoyti, sum tekur hædd fyri, at landsstýrið ikki tekur støðu móti vilja løgtingsins. **Minnilutin (Lasse Klein)** setir tí fram søljóðandi ískoyti til uppskot nevndarinnar til kommissorium fyri kommununevndina:

Pkt. D

5. Tær kommunur, sum sjálvbodnar ynskja at leggja saman, skulu hava møguleika til tess, hóast nevndin ikki er liðug við arbeiði sítt.

Umboð tjóðveldisfloksins í rættarnevndini (Signar á Brúnni), ið tekur undir við meirilutanum, hevur hesar viðmerkingar:

Spurningurin um at leggja kommunur saman hevur verið nógv umrøddur seinastu árini. Í seinasta landsstýrisskeiði, meðan Tjóðveldisflokkurin umsat kommunumál, varð skriv sent til tær føroysku kommunurnar, har heitt varð á tær um at viðgera henda spurning. Tásitandi landsstýri hevði ta áskoðan, at fyrimunir kundu vera við at leggja kommunur saman. Víst varð á, at kommunurnar samstarvast á so mongum økjum, og fyri tann einstaka borgaran lættir tað um kostnaðin av rakstrinum og íløgunum. Mong øki kundu kanska við fyrimuni verið løgd undir tílíkt samstarv ella heldur eina felags kommunu.

Um fyrimunirnir við eini samanlegging hava slíka tyngd sammett við vansarnar, sum óivað eisini eru við eini kommunusamanlegging, at ein samanlegging eigur at fara fram, so eiga kommunurnar sjálvar at taka støðu til spurningin. Tilskilast skal, at útoyggjarnar vórðu hildnar uttanfyri nevndu ætlan, tí hildið varð, at tær vóru í einar serstøðu.

Um allar tær kommunur, ið høvdu fingið áheitan frá landsstýrinum tóku undir við samanlegging, so gjørdist talið av kommunum í Føroyum 18 mótvegis teimum 50, ið vóru. Sum longu nevnt, legði tásitandi landsstýri alstóran dent á, at kommunurnar sjálvar skuldu avgera um samanlegging skuldi fara fram ella ikki.

Sjálvandi visti landsstýrið, at slíkt mál varð ikki framt frá degi til dags, men fór at taka drúgva tíð.

Sitandi landsstýrið hevur ikki somu fatan av hesum máli sum undanfarna, og hevur tí sett úr gildi ta áheitan, ið undanfarna landsstýrið sendi til kommunurnar á sumri 1994. Sitandi landsstýrið hevur hoðað frá, at talið av kommunum í Føroyum skal niður á 7 hægst 10. Hesum kann umboð tjóðveldisfloksins í rættarnevndini ikki taka undir við.

Undir viðgerðini av hesum máli – bæði undir fyrstu viðgerð og nevndar viðgerðini - er týðiliga komið til sjóndar, at tingmenn yvirhøvur binda seg ikki til eitt ávíst tal av kommunum, men eru fyrst av øllum hugaðir fyri at fáa fleri nágreiniligar upplýsingar um, hvat kommunusamanleggingar bera í sær - hvørjir fyrimunir og hvørjir vansar tað ber í sær -áðrenn nøkur endalig støða verður tikin.

Sjónarmiðini um, at útoyggjarnar eru í eini serstøðu, og eiga tí at verða viðgjørdar út frá tí, eru tikin til eftirtektar í rættarnevndini. Somuleiðis er semja í nevndini um, at møguligar serskipanir eiga at verða gjørdar fyri tey smærru bygdasamfeløgini, so at tey í mest møguligan mun varðveita síni eyðkenni.

Onnur týðandi broyting, sum rættarnevndin mælir til at samtykkja er, at broytingar í kommunuskipanini skulu byggja á sjálvbodna samanlegging og ikki tvingsil.

Umboð tjóðveldisfloksins (Signar á Brúnni) heldur, at við teimum broytingum, ið samd rættarnevnd mælir til at fremja í uppskoti landsstýrisins, er komið munandi nærri tí ætlan, ið undanfarna landsstýrið hevði og tekur tí undir við málinum við teimum broytingum, ið mælt verður at gera.

2. viðgerð 5. desember 1995. Uppskot til samtyktar frá minnilutanum Lassa Klein fall við 8-4-11 atkvøðum. Uppskot til kommissorium frá nevndini samtykt við 22-0-1 atkvøðum. Málið varð heint aftur í rættarnevndina, sum 14. desember 1995 legði fram søljóðandi

Á l i t II
í løgtingsmáli nr. 7/1995

Málið varð við 2. viðgerð 5. desember 1995 beint aftur í rettarnevndina.

Nevndin hevur havt málið til framhaldandi viðgerð.

Nevndin tekur undir við, at sett verður nevnd at gera uppskot til nýggja kommunala skipan, men hevur broytingar til uppskot til kommissorium.

Vísst verður til fyrra álitið, sum er lagt fram í hesum máli.

Ein samd nevnd setir tí fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

2. punktum verður strikað, og í staðin verður sett: "Nevndin verður mannað av 3 limum frá bý- og bygdaráðum og 3 limum frá umsitingini. Uppskotið til nýggja kommunala skipan verður gjørt við støði í niðanfyri standandi kommissorium."

A Við atlitt til núverandi kommunuskipan verður álagt nevndini:

1. At lýsa búskaparliga grundarlagið hjá kommununum.

2. At lýsa demografisku og georgrafisku viðurskiftini.

3. At greina út formligu- og óformligu viðurskiftini millum land og kommunu, t.e.m.a. uppgávu- og ábyrgdarbýtið og fíggjarlig viðurskifti.

4. At greina út umsitingarligu viðurskiftini, undir kommunalt samstarv.

5. At greina út hvørjar uppgávur kunnu leggjast út til kommunurnar í mun til nøkur nærri tilskilað alternativ íbúgvaratøl í teimum einstøku kommunalu eindunum.

6. At greina út um heildarveitingar/útjevningarskipan ella aðrar skipanir kunnu nýtast í fíggjarliga samskiftinum millum land og kommunur.

B Nevndin skal koma við tilmeli um:

1. Hvørjar uppgávur høskandi kunnu umsitast av kommunalu eindunum við støði í teimum meira greiðum uppgávubýti millum land og kommunur.

2. Høskandi tal og stødd av kommununum við støðið í B 1.

3. Møguligar serskipanir viðvíkjandi útoyggjunum verða at grunda á serstøku viðurskiftini, sum tar eru galdandi.

4. Møguligar serskipanir fyri tey smærru bygdasamfeløgini verða gjaldar soleiðis, at tey í mest møguligan mun varðveita sín eyðkenni.

C Harafturat skal nevndin koma við tilmæli um neyðugar broytingar í ávísum formligum viðurskiftum:

1. Kommunulógin skal eftirkannast í síni heild, t.v.s. dagførast og gerast greiðari.

2. Reglur um fíggjarstýring, t.e. fíggjarætlan, bókhald, roknskaparviðurskifti, reglur um lántøku og veðhaldsbindingar.

3. Avmarkingar mótvegis privata vinnulívinum.

4. Ásetingar um kommunalt samstarv.

5. Vísa á neyðugar broytingar í serlóggávuni.

D Høvðussjónarmiðini og meginreglurnar í arbeiðinum hjá nevndini skal vera:

1. Broytingar í kommunuskipanini skulu byggja á sjálvbodna samanlegging.

2. Fíggjarlig ábyrgd fylgir avgerðarrættinum.

3. Uppgávurnar verða loystar samfelagsbúskaparliga ráðiliga, men so nær borgarum sum tilber.

4. Borgararnir fáa greiða fatan av kostnaðinum av virkseminum hjá kommununi.

Framhaldandi 2. viðgerð 18. desember 1995. Broytingaruppskot frá samdari nevnd endaliga samtykt við 22-1-0 atkvøðum.

F.L. j. nr. 820-3/94.

8 Lóg um revsing fyri krígsbrotsverk í fyrrverandi Jugoslaviu

Ikki framlagt.
(avvíst)

9 Fíggjarløgtingslóg 1996.

Ár 1995. leygardagin 30. september legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi uppskot til fíggjarløgtingslóg fyri 1996:

Fíggjarløgtingslóg fyri fíggjarárið 1996.
(Bókin er til skjals á Løgtingsskrivstovuni, Føroya Landsstýri og Landsbókasavninum.

Til 1. viðgerð, 10. oktober 1995, kom eitt ískoyti (rættingar til viðmerkingar).
(Er til skjals á Løgtingsskrivstovuni, Føroya Landsstýri og Landsbókasavninum).

1. viðgerð 10. og 11. oktober. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 18. december 1995 legði fram soljóðandi

Á 1 i 1

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 30. september 1995 og eftir 1. viðgerð tann 10. og 11. oktober 1995 beint í líggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við

Jógvan I. Olsen, løgtingsformann og
Edmund Joensen, løgmann

og landsstýrismenninar

Jóannes Eidesgaard
Andrias Petersen
Sámal Petur í Grund
Óla Jacobsen
Ivan Johannesen og
Ellif Samuelsen

Saman við løgtingsformanninum var skrivstovustjóri løgtingsins á fundi og saman við løgmanni og landsstýrismonnunum vóru forstjórin, deildarstjórar og fullmektar í landsstýrisumsitingini á fundi við nevndina.

Eisini hevur nevndin havt fund við landsgrannskoðaran Leiv Harrysson.

Saman við avvarandi landsstýrismanni, hevur nevndin havt fund við umboð fyri

Landsbanka Føroya
Hagstovu Føroya
Føroya Gjaldstovu
Toll- og Skattstovu Føroya
Sjúkrahúsverkið
Landsverkfrøðingin
Strandfaraskip Landsins
Postverk Føroya
Landsskúlafyrisitingina
Ferðaráð Føroya
Húsalánsgrunnin
Stýrið fyri Klaksvíkar sjúkrahús og
Stýrið fyri Suðuroyar Sjúkrahús

Eisini hevur nevndin havt fund við

Samtakið av vinnufeløgum at troyta upsa, hýsu og losk saman við
Manningarfeløgum og Reiðarafelagnum
Føroya Fiskavirking
Føroya Havhúnaðarfelag
Føroya Reiðarafelag
Føroya Banka
Framtaksstovnin
Fiskasøluna
Føroyu Sparikassu
Nes Kommunu og
Ítróttarsamband Føroya

Nevndin hevur undir viðgerðini fingið skriv frá einstaklingum, stovnum og felagsskapum, og eru hesi skriv

tikin við í viðgerðina, eins og nevndin hevur biðið um og fingið upplýsingar, sum hava verið neyðugar í sambandi við viðgerðina av løgtingsfíggjarlógini 1996.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt allar greinar og øll rakstrarstøð á fíggjarlógini. Uppsetingin av løgtingsfíggjarlógini fyri 1996 er nógv broytt í mun til fíggjarlógaruppskotini undanfarnu ár og undir 1. viðgerð av málinum legði landsstýrið fram "Ískoyti til uppskot til fíggjarlóg 1996", rettingar til viðmerkingar og verður hetta skjal lagt við álitinum sum fylgjuskjal.

Landstýrið hevur í uppskotinum roknað við 12 mió. kr. í ósundurgreindum sparingum. Hesin peningur skal sparast við bygnaðarbroytingum. Samgongan hevur sett sær fyri, at hesar og aðrar sparingar fyri 20 mió. kr. verða framdar eftir árslok. Hetta arbeiðið er sett til at verða avgreitt um mánaðarskiftið februar/mars 1996 og kunnu hesar sparingar tí ikki takast við í fíggjarlógaruppskotinum fyri 1996.

Samtaert lógini um fløgustuðul til feskfiskaflotan missa nøkur skip fløgustuðulin í 1996. Talan er um 23 partrolarar og 11 stállínuskip, sum tilsamans fáa umleið 16,5 mió. kr. í fløgustuðuli um árið. Frá Reiðarafelagnum er upplýst fyri nevndini, at feskfiskaskipini við galdandi kvotum og verandi avreiðingarprísum klára raksturin, men ikki rentur og avdráttir. Miðalavlopið fyri stállínuskip er um 100.000 kr. áðrenn rentur og avdráttir, meðan partrolararnir hava eitt miðalavlop uppá 200.000 kr. Fløgustuðulin verður nýttur til at gjalda rentur og avdráttir. Landsstýrisins meting er tó, at hesin partur av feskfiskaflotanum kann greiða skyldur sínar, hóast fløgustuðulin fellur burtur.

Til fløgustuðul til alivinnuna eru í verandi fíggjarári játtaðar 25 mió. kr. Í uppskoti landsstýrisins til løgtingsfíggjarlóg 1996 er henda játtan sett til 10 mió. kr. Í heyst er prisurin á alilaksi fallin munandi og er komin niður á 19 kr./kg. Orsøkin til tað stóra prísfallið er stór framleiðsla av alilaksi, serliga í Noregi. Alivinnan hevði annars roknað við einum meðalsøluprísi á laksi fyri 1995 uppá 26 kr./kg.

Nýggja fiskasølan arbeiðir við at byggja marknaðin uppaftur, eins og royndir verða gjørdar við at koma inn á nýggjar marknaðir. Málsetningurin er at framleiða góðskaðar vørur og at koma so langt út í søluliðið sum gjørligt. Fiskasølan hevur sett sær sum mál at selja fyri 900 mió. kr. árliga, og av hesum skulu ikki meira enn 50 mió. kr. verða blokkframleiðsla. Ein partur av veiðimi hjá føroysku skipunum verður seld óvirkað av landinum, meðan 1/3 av fiskinum, sum verður virkaður á føroysku fiskavirkjunum, er innfluttur fiskur.

Nevndin hevur fingið skriv frá landsstýrinum, har landsstýrið heitir á nevndina um at seta nøkur broytingaruppskot fram bæði viðvikjandi inntøkusíðuni og útreiðslusíðuni. Viðvikjandi inntøkunum mælir landsstýrið til, at skattainntøkan verður lækkað við 87,5 mió. kr., harav 80 mió. kr. fara til broytingar í sjálvum skattastiganum, 5 mió. kr. til lækking av barnafrádráttinum í landsskattinum (500 kr./barn) og 2,5 mió. kr. til lækking av skattahámarkinum úr 55% niður í 52%. Umfram hetta kostar lækkingin kommununum uml. 1,4 mió. kr.

Landsstýrið metir, at skattalækkingin fer at fora við sær, at virksemið verður økt í slíkan mun, at landskassin kemur at fáa eina cykáinntøku uppá 30 mió. kr. Tí mælir landsstýrið til, at grein 35 "Skattir og avgjøld" verður broytt soleiðis, at rakstrarstað [20] "Vanligur skattur" verður lækkað við 10 mió. kr. og rakstrarstað 2022 "Meirvirðisgjald" við 20 mió. kr.

Viðvikjandi grein 19 "Ósundurgreindar sparingar" sigur landsstýrið: *"Samgongan hevur sett sær fyri, at hesar sparingar upp á 12 mió. kr. og aðrar fyri 20 mió. kr. verða framdar beint eftir árslok. Hetta arbeiðið er sett til at verða avgreitt um mánaðarskiftið februar/mars. Tí verður mælt til, at minnútreiðslan á grein 19 upp á 12 mió. kr. verður lækkað til 32 mió. kr."*

Annars er landsstýrisins meting av hallinum á fíggjarlógaruppskotinum henda:

"Hallið á uppskotinum frá 30. september 1995:	*12,3 mió. kr.*
- nýggjasta eftirmeting av inntøkunum:	*50 mió. kr.*
- hall áðrenn skattalætta:	*7,3 mió. kr.*
- skattalættin o.a.	*9,1 mió. kr.*
- økking av hallinum til	*16,4 mió. kr.*
- øktar inntøkur orsakað av skattalættanum	*30 mió. kr.*

- halt *1,34 mió. kr.*

Landsstýrið sigur, at umfram hetta kemur aður fráboðaða arbeiðið við bygnaðarbroytingum og sparingum, sum kemur at minka hallið á uppskotinum fyri 1996 við 20 mió. kr. til 114 mió. kr. Viðvíkjandi broytingum í skattastiganum verður víst til løgtingstógaruppskotið hesum viðvíkjandi.

Um broytingarnar í arvagjøldunum sigur landsstýrið, at hetta lógaraboðið fer at taka drúgvari tíð enn fyri mett. Í Danmark eru fyri stuttum broytingar gjørdar hesum viðvíkjandi, soleiðis at arvagjøldini verða nvgreidd av búnum. Landsstýrið umbugsar somu skipan og at skatta gávubrøvini eisini. Uppskotið verður væntandi framlagt skjótast gjørligt, so tað kann verða samtykt í januar 1996. Hetta broytir ikki ætlaðu inntøkurnar av arva- og gávugjøldum.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meirilutu og ein minniluta. Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Kristian Magnussen, Álvur Zachariasen, Finnbogi Ísakson, Torður J. Niclasen og Finnbogi Arge) fører fram:

Frá landsbankanum hevur fíggjarnevndin fingið eina nýggja meting av rentuútreiðslunum fyri 1996. Sambært hesi meting verða rentuútreiðslurnar 5 mió. kr. lægri, enn landsstýrið hevur mett í sínum uppskoti. Meirilutin mælir til, at játtanin til rentur verður lækkað samsvarandi.

Meirilutin heldur, at inntøkurnar fara at verða nakað lægri, enn landsstýrið hevur mett, og mælir meirilutin tí til at hækka inntøkusíðuna við 15 mió. kr. Vanligur skattur við 5 mió. kr., meirvirðisgjald 5 mió. kr. og skrásetingargjaldið av motorakførum 5 mió. kr. Umfram tær metingar, sum landsstýrið hevur gjørt byggir meirilutin sínar metingar á, at mest loyvda veiðan eftir toski verður hækkað, at fleiri kommunur lækka skattaprosentið og fløguvirksemið hjá kommununum økist munandi. Hetta gevur øktar skattainntøkur og størri nýtslu.

Viðvíkjandi skrásetingargjaldinum ger meirilutin vart við, at sambært eykafíggjarlógini fyri 1995 er inntøkan av hesum mett til 10 mió. kr., men hevur givið landskassanum 37 mió. kr. Í uppskotinum til fíggjarløgtingslóg fyri 1996 hevur landsstýrið skotið upp at seta hesa upphædd til 25 mió. kr. Meirilutin heldur tað vera ráðligt at seta inntøkuna av skrásetingargjaldinum fyri 1996 til 30 mió. kr. og setir fram broytingaruppskot samsvarandi hesum.

Á útreiðslusíðuni mælir landsstýrið til at gera hesar broytingar, sum meirilutin í fíggjarnevndini tekur undir við og setir fram sum sínt egnu broytingaruppskot:

"Grein 4 Lógarmál	
verður lækkað	*kr. 30.000.*
Grein 6 "Almannamál"	
Rakstrarstuð 19678 "Viðbót til divisar pensionistar"	
verður hækkað	*kr. 3,5 mió.*
Grein 9 Útbúgving og gransking	
verður hækkað	*kr. 295.000.*
Grein 10 Mentan	
verður hækkað	*kr. 500.000.*
Grein 13 Fiski-, ali og sjóvinna	
verður lækkað	*kr. 343.000*
Grein 15 Landbúnaður	
verður hækkað	*kr. 275.000*
Grein 16 Samferðsla og samskifti	
verður hækkað	*kr. 3,994 mió.*
fløgnætlan verður hækkað	*kr. 5 mió.*
Grein 18 Eftirlønir	
verður hækkað	*kr. 600.000.*

Umfram hetta, setir sami meirilutí fram niðanfyristandandi broytingaruppskot

<u>Grein 1 Løgtingið</u>

Rakstrarstað 10018/ Ferðapeningur uttanlands
verður hækkað kr. 150.000.

Orsøkin til hækkingina er øki samstarv við tingini í øðrum londum, serstakliga í okkara grannalondum.

Rakstrarstað 10158 Løgtingsskrivstovan
verður hækkað kr. 1.089 mió.

Nýggja stýrisskipannarlógin hevur við sær, at arbeiðið hjá løgtingsskrivstovuni er mógv økt í mun til áður. Eitt starv sum løgfrøðiligur fulltrúi er normerað afturat, so at normeringin til løgfrøðiligar fulltrúar verður tvey heil støv.

Rakstrarstað 10106 Løgtingsbygningur
verður hækkað kr. 216.000.

Orsøkin til hækkingina er tann, at landsstýrið undir viðgerðini av figgjarlógaruppskotinum, hevur sett játtanina 216.000 kr. lægri, enn tað, sum formansskapurin í løgtinginum hevði biðið um.

Rakstrarstað 10177 Løgtingsins Umboðsmaður
verður hækkað kr. 500.000.

Í samband við hesa játtan verður víst á áður gjørdar samtyktir um at skipa eitt starv sum løgtingsins umboðsmaður. Upphæddin fevnir eisini stovningarútreiðslur.

Rakstrarstað 10607 Norðurlandaráðið
verður hækkað kr. 50.000.

Samsvarandi cykaffggjarlógina fyri 1995 er uppskotna játtanin frá landsstýrinum í lægra lagi. Tí verður mælt til at hækka hesa játtan til kr. 400.000.

Grein 6 Almannamál

Rakstrarstað 19042 Serfosorg
verður hækkað kr. 100.000

Sambýlið "Eysturstræti 4" kr. 100.000.
Verður játtað til rakstur.

Rakstrarstað 19075 Røktarheim
Elfis- og umlættingarheimið í Tórshavn
verður hækkað kr. 200.000

Til skiftirúm til starvsfólkið, rúm til umsjónarmannin og goymslurúm.

Rakstrarstað 19607 Heimarøktarskipanin (Rakstrarjáttan)
verður hækkað kr. 500.000

Meirilutin ásannar at tørvurin á heimarøktini er av ymiskum orsøkum stødugt vaksandi.

Rakstrarstað 19904/373305 Landsstýrinum at ráða yvir
verður hækkað kr. 100.000

Meirilutin heldur tað vera rætt, at hildið verður fram við livikorskanningi.

Grein 8 Heilsumál

Rakstrarstað 12007 Sjúkrakassar
verður hækkað kr. 1 mió.

Skotið verður upp at hækka játtanina soleiðis, at endurgjaldsprosentið úr landskassanum til sjúkrakassarnar verður samsvarandi játtanini.

Rakstrarstað 12109 Landssjúkrahúsið
verður hækkað kr. 2,250 mió.

Í viðmerkingunum til eykafíggjarløgtingslógina 1995 sigur landsstýrið, at við verandi gongd fer Landssjúkrahúsið at hava eina minni nýtslu uppá 2 mió. kr. ið tó verður mótsvarað av, at starvsfólkini hava umleið 2 mió. kr. til góður í uppspardum tímum. Flestu starvsfólkini vilja heldur hava peningin tilgóður fyri seinni at kunna avspáka. Viðari verður sagt, at seinni verður fíggjarnevndin søkt um eykajáttan til Landssjúkrahúsið 1996 samsvarandi hesum. Meirilutin heldur tað vera rettari, at umrædda rakstrarstuð á eykafíggjarlógini fyri 1995 verður hækkað við 2 mió. kr., meðan rakstrarstaðið á fíggjarlógini fyri 1996 verður hækkað samsvarandi.

Hesini mælir meirilutin til at hækka játtanina hjá Landssjúkrahúsinum til sjúkraflutning við 250.000 kr. Henda upphædd verður at nýta sum fskoyti til tess at tryggja nøktandi sjúkraflutning úr Nólsoy til Havnar.

Rakstrarstað 12202 Klaksvíkar sjúkrahús
verður hækkað kr. 1,800 mió.

Á fundi við fíggjarnevndina hava umboð fyri Klaksvíkar sjúkrahús greitt frá, at um játtanin fyri 1996 verður skerd við 1,8 mió. kr. í mun til játtanina fyri 1995 kemur hetta at fáa stórar avleiðingar fyri virksemið á sjúkrahúsinum.

Rakstrarstað 12304 Suðuroyar Sjúkrahús
verður hækkað kr. 1,500 mió.

Á fundi við fíggjarnevndina hava umboð fyri Suðuroyar sjúkrahús greitt frá, at nýggi parturin av sjúkrahúsinum er tikin í nýtslu, og at hetta hevur meirkostnað við sær fyri raksturin av sjúkrahúsinum. Meginparturin av hesi upphædd er til ljós, hita, reingerð o.a.

12912 Viðgerð av rúsevnismisnýtslu
Heilbrigðið
verður hækkað kr. 400.000.

Fyri at tryggja sama virksemi á viðgerðarstovninum Heilbrigðið mælir meirilutin til, at játtanin verður hækkað 400.000 kr.

Grein 9 Úthúgving og gransking

Rakstrarstað 14307 Tekniski Skúli í Klaksvík
verður hækkað kr. 180.000

Til ymisk umvælingararbeiði í sambandi við, at tekjan á einum parti á skúlanum lekur, hevur Tekniski Skúlin í Klaksvík søkt um kr. 800.000, men hevur landsstýrið á uppskoti sínum mælt til bert at játta 500.000 kr. Sambert landsarktitektinum ber ikki til at fara undir hetta arbeiðið uttan so, at alt verður gjørt. Mett verður, at samlaði kostnaðurin verður 680.000 kr., og tí mælir meirilutin til at hækka játtanina við 180.000 kr.

Rakstrarstað 14466 Føroya Sjómansskúli
verður hækkað kr. 700.000

Sambært viðmerkingunum hjá landsstýrinum er tørvur á at útvega nýggja teldutgerð til Føroya Sjómannaskúla. Sambært fíggjarlógaruppskotinum verður hetta gjørt á tann hátt, at skúlin útvegar tann neyðuga peningin við at taka ein flokk minni inn í 1996. Vísandi til tann stóra tørvin og áhugan fyri úthúgvingini mælir meirilutin til at játtanin verður hækkað við kr. 700.000, soleiðis at skúlin í 1996 kann taka nærmingar inn sum árini frammanundan.

Grein 13 Fiski-, alj- og sjóvinna

Nýtt rakstrarstað
Veðurtænasta (DMI) kr. 360.000

Við skrivi til fíggjarnevndina hevur landsstýrið heitt á nevndina um at seta fram broytingaruppskot við tí fyri eyga at játta 360.000 kr., sum verða at nýta til eina nútímansgjørda upplýsingartænastu. Meirilutin hevur tikið hesa áheitan til eftirtektar.

Vaktar- og Bjargingartænastan
Veðurtænastan kr. 500.000

Ongin veðurtænasta hevur verið á Vaktar- og Bjargingartænastuni, síðani veðurfrøðingurin fór frá fyri aldur. Meirilutin heldur tað verða rætt at seta annan veðurfrøðing í starv á V & B og mælir tí til at játta 500.000 kr. til hetta endamál.

Rakstrarstað 18485 Menning av fiskivinnu á landi
verður lækkað kr. 9 mió.

Í uppskotinum til fíggjarlóg fyri 1996 hevur landsstýrið skotið upp at seta 18 mió. kr. av til endamálið. Hetta er tað sama, sum varð játtað á fíggjarlógini fyri 1995. Seinastu tølini benda á, at nýtslan hert svarar til umleið helmingin av játtanini. Út frá hesum mælir meirilutin til at lækka játtanina. Verður tørvurin á peningi størri í 1996, vil meirilutin taka undir við at veita hesum rakstrarstað neyðuga eykajáttan.

Grein 14 Vinnulív

Framtak fyri útlendskar íløgur
verður hækkað kr. 300.000

Á fundi við fíggjarnevndina hevur landsstýrismaðurin í vinnumenningarmálum upplýst, at landsstýrið hevur gjørt sáttmála við tveir menn um at arbeiða fyri Føroyar eftir Lapril 1996. Ætlanin er at kanna møguleikan fyri at fáa nýggjar vinnur til Føroyar. Sambært landsstýrismannanum er samlaði kostnaðurin 800.000 kr. Tí verður mælt til at hækka játtanina.

Grein 16 Samferðsla og sumskifti

Nýgerðir – vegir
Verður hækkað
kr. 8 mió.

Hækkingin verður nýtt soleiðis:
Vág - Lopra - Sumba
verður hækkað kr. 3,0 mió.
Kr. 1 mió til vegagerð Vág - Lopra, kr. 2 mió til bergholið.
Vegagerð í Vágum
verður hækkað kr. 0,5 mió.
Fjarðaveguria
verður hækkað kr. 1,0 mió.
Vegagerð í Kalsoy

verður hækkað kr. 0,5 mió.
Gamlarætt-Tórshavn
verður sett til kr. 3,0 mió.

Meirilutin heldur tað vera rætt at hækka játtanina til ymisk arbeiði hjá landsverkstroðinginum. Peningurin fer so at siga allur til at breiðka, beina og styrkja vegir og hildið verður, at hetta gevur væl av arbeiði.

Rakstrarstað 13989 Útvarps- og sjónvarpssendistøðir (rakstrarjáttan)
verður lagt saman við
rakstrarstað 13125 Útvarpssendistøðir, sum fær navnabroyting til "Útvarps- og sjónvarpssendistøðir" og
verður hækkað kr. 500.000.

Rakstrarstaðið er hækkað við 500.000 kr., sum verða at nýta afturat tí, sum annars verður brúkt av hesum rakstrarstað til at halda millumbylgjusendaran í gongd. Endamálið er at skapa fyritreytir fyri, at millumbylgjusendarin kann vera í gongd størri part av degnum enn higartil.

Íløgujáttanin á 13989 uppá 5 mió. kr. verður óbroytt standandi soleiðis, sum landsstýrið hevur skotið upp.

Grein 19 Ósundurgreindar sparingar
verður sett til kr. 0.

Tá fíggjarlógaruppskotið var lagt fram, hevði landsstýrið ætlanir um at finna bygnaðarsparingar fyri 12 mió. kr. Seinni er talið hækkað til 32 mió. kr. og arbeiðið er útsett til fyrst í komandi ári. Orsakað av hesum mælir meirilutin til, at tær 12 mió. kr. verða tiknar av fíggjarlógini. Hetta merkir, at hallið av hesi orsøk verður økt samsvarandi.

Grein 30 Rentur
verður lækkað kr. 5 mió.

Víst verður til viðmerkingarnar fremri í álitinum, har sagt verður, at landsbankin hevur mett renturútreiðslurnar fyri 1996 av nýggjum.

Grein 35

Rakstrarstað 1201 Vanligur skattur
verður hækkað kr. 15 mió.

Rakstrarstað 2022 Meirvirðisgjald
verður hækkað kr. 25 mió.

Rakstrarstað 2713 Skrásetingargjald
verður hækkað kr. 5 mió.
Víst verður til viðmerkingar fremri í álitinum hjá meirilutanum.

Úrslitið aftan á rakstur og íløgur gevur sostatt eitt hall upp á kr. 138,5 mió.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Kristian Magnussen, Álvur Zachariasen, Finnbogi Ísakson, Tordur J. Niclasen og Finnbogi Arge) setir samsvarandi hesum fram hetta broytingaruppskot til uppskot landsstýrisins:

BROYTINGARUPPSKOT I

Høvuðsyvirlit yvir fíggjarlógaruppskotið fyri 1996

Rakstrarætlan				Íløgu-ætlan	
Grein	**fús. kr.**	**Útreiðslur**	**Inntøkur**		**Undirskot**
§ 1	Løgtingið	2.005			
§ 2	Meginfyrisiting				
§ 4	Lógarmál	30			
§ 5	Fíggjarmál				
§ 6	Almannamál	700		200	
§ 7	Íbúðamál				
§ 8	Heilsumál	6.950			
§ 9	Útbúgving og gransking	1.175			
§ 10	Mentan	500			
§ 11	Umhvørvi og orka				
§ 13	Fiski-, ali- og sjóvinna	-8.983			
§ 14	Vinnulív	300			
§ 15	Landbúnaður	275			
§ 16	Sumferðsla og samskifti	-3.994		13.000	
§ 17	Arbeiðsmarknaður				
§ 18	Eftirlønir	600			
§ 19	Ósundurgreindar sparingar	12.000			
Tilsamans		**11.498**	**0**	**13.200**	
§ 30	Rentur	-5.000			
§ 33	Skattir og avgjøld		5.000		
§ 38	Ríkisstuðul				
Rakstrar-,íløgu- og útlánsætlan		**6.498**	**5.000**	**13.200**	**-14.698**
Nettokassaundirskot					
Bruttokassaundirskot					

§ 1 Løgtingið

A. Yvirlit

Játtanayvirlit

Túsund kr.	Nettotal	Útreiðslur	Inntøkur
Inntøkujáttan ..	2.005	2.005	-

Løgtingið	**1.455**	-
Løgtings umboðsmaður	**500**	-
Stovnar knýttir av Løgtinginum ..	**50**	-

B. Játtanir

			Útreiðslur	Inntøkur
Løgtingið				
10018	Ferðapeningur uttanlands (Rakstrarjáttan)	F	150	-
	Hjá fíggjarnevndarmeirlutanum	**BU**	**150**	-
10158	Løgtingsskrivstovan (Rakstrarjáttan)	F	2.327	-
	Hjá fíggjarnevndarmeirlutanum	**BU**	**1.089**	-
	Játtanin hækkað við kr. 1.089.000			
10106	Løgtingshygningurin (Rakstrarjáttan)	F	558	-
	Hjá fíggjarnevndarmeirlutanum	**BU**	**216**	-
	Játtanin hækkað við kr. 216.000			
Løgtingsins Umboðsmaður				
10177	Løgtingsins Umboðsmaður (Rakstrarjáttan)	F	300	-
	Hjá fíggjarnevndarmeirlutanum	**BU**	**500**	
	Játtanin hækkað við kr. 500.000			
Stovnar knýttir at landinum				
10607	Norðurlandaráðið (Rakstrarjáttan)	F	350	-
	Hjá fíggjarnevndarmeirlutanum	**BU**	**50**	
	Játtanin hækkað við kr. 50.000			

Viðmerkingar til broytingaruppskot

Løgtingið

10018 Ferðapeningur uttanlands (Rakstrarjáttan)
Sum nýggj budgettsundurgreining verður innsett:

"Budgettsundurgreining

tús. kr.	1992	1993	1994	B 1995	F 1996
Útreiðslujáttan					300
Útreiðslur					**300**
Ferðing					300

10158 Løgtingsskrivstovan (Rakstrarjáttan)
Sum nýggj budgettsundurgreining og starvsfólkayvirlit verður innsett:

"Budgettsundurgreining

tús.kr.	1992	1993	1994	B 1995	F 1996
Útreiðslujáttan	1.972	1.977	2.343	2.595	3.416
Útreiðslur					3.416
Lønir					2.677
Annað					739

Starvsfólkayvirlit

	1995	1996
Tal av fulltíðarstørvum	9.5	10

10106 Løgtingsbygningurin (Rakstrarjáttan)
Sum nýggj budgettsundurgreining verður innsett:

"Budgettsundurgreining

tús. kr.	1992	1993	1994	B 1995	F 1996
Útreiðslujáttan		774	732	774	774
Útreiðslur		774	732	774	774
Lønir					541
Annað					233

Løgtingsins Umboðsmaður

10177 Løgtingsins Umboðsmaður (Rakstrarjáttan)
Sum nýggj budgettsundurgreining verður innsett:

"Budgettsundurgreining

tús. kr.	1992	1993	1994	B 1995	F 1996
Útreiðslujáttan				300	800
Útreiðslur				**300**	**800**
Lønir					500
Annað					300

Stovnar knýttir at Løgtinginum

Sum nýggj budgettsundurgreining verður innsett:

"Budgettsundurgreining

tús. kr.	1992	1993	1994	B 1995	F 1996
Útreiðslujáttan					400
Útreiðslur					**400**
Ferðing					400

§ 4 Lógamál

A. Yvirlit

Játtanaryvirlit:

Túsund kr.	Nettotal	Útreiðslur	Inntøkur
Inntøkujáttan	-30	-57.435	-57.405

Felagsútreiðslur	**65**	**95**
Almennt riknar fyritøkur	**57.500**	**-57.500**

B. Játtanir

Felagsútreiðslur			**Útreiðslur**	**Inntøkur**
11048	Kunngerðablað- og savn	F	350	-
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	**BU**	**0**	**70**
	Nettotøl verða broytt til bruttotøl			
11879	Lógasavn	F	400	-
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	**BU**	**25**	**25**
	Nettotøl verða broytt til bruttotøl			

11971 /253704	Útreiðslur av vali	F	100	-
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum Játtan lækkað 50.000	BU	**-50**	-
11991 /253753	Dóms- og løgreglumál	F	50	-
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum Játtanin hækkað við kr. 20.000.	BU	**20**	-
6408	Rúsdrekkasølla landsins (Rakstrarjáttan)	F	69.500	82.000
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum Bruttoumsetningur broyttur til skiftisavlop.	BU	**-57.500**	**-57.500**

Viðmerkingar til broytingaruppskot

Felagsútreiðslur

11048 Kunngerðablað- og savn
Broytingin viðførir ikki broytingar í viðmerkingunum.

11879 Lógasavn

Sundurgreining av broytingaruppskoti

tús. kr.	F 1996
Útreiðslujáttan	25
Inntøkujáttan	25
Útreiðslur	**25**
Lønir	-
Annað	25
Inntøkur	**25**

11971/253704 Útreiðslur av vali (Rakstrarjáttan)
Broytingin viðførir ikki broytingar í viðmerkingunum.

11991/253753 Dóms- og løgreglumál (Rakstrarjáttan)
Broytingin viðførir ikki broytingar í viðmerkingunum

Alment riknar fyritøkur

6408 Rúsdrekkasøla landsins (Rakstrarjáttan)
Broytingin viðførir ikki broytingar í viðmerkingunum.

§ 5 Fíggjarmál

A. Yvirlit

Játtanaryvirlit:

Túsund kr.	Nettotal	Útreiðslur	Inntøkur
Útreiðslujáttan	-	20	20
Fíggjarfyrisiting v.m.		**20**	**20**

B. Játtanir

			Útreiðslur	Inntøkur
Fíggjarfyrisiting v.m.				
11452	Føroya Gjaldstova (Rakstrarjáttan)	F	12.783	300
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	**BU**	-	-
	Í viðmerkinguntum verður nýggj budgettsundurgreining innsett.			
11808	Innheintingarútreiðslur	F	398	-
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	**BU**	-	-
	Játtanarslagið verður broytt til "Rakstrarjáttan" og nýggjar viðmerkingar			
11706	Hagstova Føroya (Rakstrarjáttan)	F	3.958	-
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	**BU**	**20**	**20**
	Nettotøl verða broytt til bruttotøl			

Viðmerkingar til broytin garuppskot

Fíggjarfyrisiting v.m.

11452 Føroya Gjaldstova (Rakstrarjáttan
Sum nýggj budgettsundurgreining verður innsett:

Budgettsundurgreining

tús. kr.	1992	1993	1994	B 1995	F 1996
Útreiðslujáttan	**11.558**	**10964**	**11.368**	**11.593**	**12.783**
Inntøkujáttan	18	0	267	250	300
Útreiðslur	11.558	10.964	11.368	11.593	12.783
Lønir	7.837	7.011	7.392	7.952	7.890
Annað	3.721	3.953	3.976	3.641	4.893
Inntøkur	**18**	**0**	**267**	**250**	**300**

11808 Innheintingarútreiðslur (Rakstrarjáttan)
Sum viðmerking verður innsett:

Endamálið við játtanini er innkrevjing av skuld til landskassan.

Løn til innheintingarfulltrúan og kostnaðin av innheintingum og rettarmálum, verður goldin av hesum rakstrarstað.

Budgettsundurgreining

tús. kr.	1992	1993	1994	B 1995	F 1996
Útreiðslujáttan		327	500	500	398
Útreiðslur		**327**	**500**	**500**	**398**
Lønir		206	208	210	212
Annað		121	292	290	186

Starvsfólkayvirlit

	1995	1996
Tal av fulltíðarstørvum	1	1

11706 Hagstova Føroya (Rakstrarjáttan)
Broytingaruppskotið viðførir ikki broytingar í viðmerkingunum.

§ 6 Almannamál

A. Yvirlit

Játtanaryvirlit

Útreiðslur	327	500	500	398
Lønir	206	208	210	212

Túsund kr.	Nettotal	Útreiðslur	Inntøkur
Útreiðslujáttan	700	5.671	4.971
Íløgujáttan	200	200	-

Felagsútreiðslur	100	-
Barnastuðul	1.121	1.121
Sjúkradagpeningur	1.300	1.300
Hjálp og røkt av eldri og brekaðum	800	-
Ymiskar hjálparskipanir	2.550	2.550

B. Játtanir

			Útreiðslur	Inntøkur
Fíggjarfyrisiting v.m.				
11452	Føroya Gjaldstova (Rakstrarjáttan)	F	12.783	300
			Útreiðslur	**Inntøkur**
Felagsútreiðslur				
19887	Kærunevndin (Rakstrarjáttan)	F	556	-
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	**BU**	-	-
	Í viðmerkingunum verður játtanarslagið broytt til "Rakstrarjáttan"			
19904/ 373305	Landsstýrinum at ráða yvir	F	300	-
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	**BU**	**100**	-
	Játtanin hækkað við kr. 100.000.			
Barnastuðul				
19557	Barnaforsorg (Lógarbundin játtan)	F	15.262	-
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	**BU**	**1.107**	**1.107**
	Nettotøl broytt til bruttotøl			
19227	Barnapeningur (Lógarbundin játtan)	F	200	-
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	**BU**	**14**	**14**
	Nettotøl broytt til bruttotøl			
Sjúkradagpeningur				
19659	Dagpeningaskipanin (Lógarbundin játtan)	F	32.000	-
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	**BU**	**1.300**	**1.300**
	Nettotøl broytt til bruttotøl			
Hjálp og røkt av eldri og brekaðum				
19042	Serforsorg	F	47.274	2.203
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	**BU**	**100**	-
	Broytt nýtsla og játtanarslagið verður broytt til "Rakstrarjáttan"			
	Ellis- og Uttlættingarheimið í Tórshavn (Øgugjáttan)	F	200	-
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum (Nýtt rakstrarstað)			
	Játtaðar verða kr. 200.000 til umbyggingar.			
19607	Heimarøktarskipanin (Rakstrarjáttan)	F	66.813	5.089
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	**BU**	**500**	-
	Játtanin hækkað við kr. 500.000			
Ymiskar hjálparskipanir				
19403	Vanlig forsorg (Lógarbundin játtan)	F	35.000	-
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	**BU**	**2.550**	**2.550**
	Nettotøl broytt til bruttotøl			

Viðmerkingar til broytingaruppskot

Felagsútreiðslur

19887 **Kærunevndin** (Ónnur játtan)
Sum nýggj yvirskrift til rakstrarstaðið verður innsett:
"**19887 Kærunevndin** (Rakstrarjáttan)"

19904 **Landsstýrinum at ráða yvir**

Sum viðmerking verður innsett:

"Av besum skulu kr. 100 tús. nýtast til framhald av livikorskanningini."

Barnastuðul

19557 **Barnaforsorg** (Lógarbundin játtan)
Broytingin viðfører ikki broytingar í viðmerkingunum.

19227 **Barnapeningur** (Lógarbundin Játtan)
Broytingin viðfører ikki broytingar í viðmerkingunum.

Sjúkradagpeningur

19659 **Dagpeningaskipanin** (Lógarbundin játtan)
Nýggj budgettsundurgreining verður innsett:

"Budgettsundurgreining

tús. kr.	1992	1993	1994	B 1995	F 1996
Útreiðslujáttan		33.088	31.487	32.000	33.300
Inntøkujáttan		-	-	-	1.300
Útreiðslur		**33.088**	**34.487**	**32.000**	**33.300**
Inntøkur		**-**	**-**	**-**	**1.300**

Viðmerking:
Tølini frá 1992 til 1995 eru nettotøl".

Hjálp til røkt av eldri og brekaðum

19042 **Serforsorg** ((Rakstrarjáttan)

Í viðmerkingunum verður innsett í "Uppskotið hjá Alm annastovuni kann útgreinast soleiðis:", sum seinasta linja eftir "Bústovnurin 'Sólteigur'": "Sambýlið 'Eysturstrætið 4'" kr. 100 tús.

Samanteljingin "Serforsorg tilsamans" verður hækkað samsvaran di við kr. 100 tús. til 47.750.040 og "Landskassapartur" hækka við kr. 100 tús. til 47.360.826.

Ellis- og Umlættingarheimið í Tórshavn (Íløgujáttan)
Á Ellis- og umlættingarheiminum í Tórshavn skal gerast skiftirúm til starvsfólkið, rúm til umsjónarmannin og goymslurúm.

19607 Heimarøktarskipanin (Rakstrarjáttan)
Sum nýggj budgettsundurgreining verður innsett:

"Budgettsundurgreining

tús. kr.	1992	1993	1994	B 1995	F 1996
Útreiðslujáttan		58.715	62.520	64.518	67.313
Inntøkujáttan		3.821	4.512	4.448	5.089
Útreiðslur		**58.715**	**62.520**	**64.518**	**67.313**
Lønir		55.361	58.654	61.169	63.264
Annað		3.354	3.866	3.349	4.049
Inntøkur		**3.821**	**4.512**	**4.448**	**5.089**
Brúkaragjald		853	1.375	1.200	1.700
Komminupartur		2.968	3.137	3.248	3.389

Ymiskar hjálparskipanir

19403 Vanlig forsorg (Lógarbundmin játtan)
Broytingin viðfører ikki broytingar í viðmerkingunum.

§ 8 Heilsumál

A. Yvirlit

Játtanuryvirlit:

Túsund kr.	Nettotal	Útreiðslur	Inntøkur
Útreiðslujáttan	6.950	6.950	-
Heilsutænasta		1.000	-
Sjúkrahús v.m.		5.550	-
Aðrir viðgerðastovnar		400	-

B. Játtanir

			Útreiðslur	Inntøkur
Heilsutænasta				
12007	Sjúkrakassar	F	14.500	-
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	**BU**	**1.000**	**-**
	Játtanin hækkað við kr. 1.000.000			
Sjúkrahús v.m.				
12109	Landssjúkrahúsið (Rakstrarjáttan)	F	218.702	8.165
	Játtanin hækkað við kr. 2.250.000			
12202	Klaksvíkar Sjúkrahús (Rakstrarjáttan)	F	35.838	-
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	**BU**	**1.900**	**100**
	Játtanin hækkað við kr. 1.900.000			
12304	Suðuroyar Sjúkrahús (Rakstrarjáttan)	F	24.820	100
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	**BU**	**1.400**	**-100**
	Játtanin hækkað við kr. 1.400.000 og nettotøl verða broytt til bruttotøl.			
Aðrir viðgerðastovnar				
12912	Viðgerð av rúsevnismisnýtslu (Rakstrarjáttan)	F	8.000	-
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	**BU**	**400**	**-**
	Játtanin hækkað við kr. 400.000.			

Viðmerkingar til broytingarupposkot

Heilsutænasta

12007 Sjúkrakassar

Nýggj budgettsundurgreining innsett:

"Budgettsundurgreining

tús. kr.	1992	1993	1994	B 1995	F 1996
Útreiðslujáttan		16.953	15.000	16.000	15.500
Útreiðslur		**16.953**	**15.000**	**16.000**	**15.000**

Sjúkrahús v.m.

12109 Landssjúkrahúsið (Rakstrarjáttan)
Víst ferður til "Ískoyti til uppskot til fíggjarlóg 1996"

Sum nýtt seinasta reglubrot eftir "Við atliti til at .... hækkað við kr. 3.309.000" verður innsett:
"Av játtaðu hækkingini skulu kr. 250 tús. nýtast sum ískoyti til tess at tryggja ein nøktandi sjúkrallutning úr Nólsoy til Tórshavn."

Sum nýggj budgettsundurgreining verður innsett:

"Budgettsundurgreining

tús. kr.	1992	1993	1994	B 1995	F 1996
Útreiðslujáttan	231.030	210.684	215.101	216.879	220.951
Inntøkujáttan	8.048	7.334	7.221	8.481	8.165
Útreiðslur	**231.030**	**210.684**	**215.101**	**216.879**	**220.952**
Lønir	178.877	156.816	158.711	162.680	171.851
Annað	52.160	53.868	56.390	54.199	49.101
Inntøkur	**8.048**	**7.334**	**7.221**	**8.481**	**8.165**

2202 Klaksvíkar Sjúkrahús (Rakstrarjáttan)

Víst verður til "Ískoyti til uppskot til fíggjarlóg 1996"

Budgettsundurgreiningin verður broytt til:

Budgettsundurgreining

tús. kr.	1992	1993	1994	B 1995	F 1996
Útreiðslujáttan	41.981	38.057	38.482	38.014	37.738
Inntøkujáttan	832	144	118	150	100
Útreiðslur	**41.981**	**38.057**	**38.482**	**38.014**	**37.738**
Lønir	30.717	27.032	26.406	27.316	29.202
Annað	11.264	11.025	12.76	10.698	8.736
Inntøkur	**832**	**144**	**118**	**150**	**100**

12304 Suðuroyar Sjúkrahús (Rakstrarjáttan)

Víst verður til "Ískoyti til uppskot til fíggjarlóg 1996"

Budgettsundurgreiningin verður broytt til:

Budgettsundurgreining

tús. kr.	1992	1993	1994	B 1995	F 1996
Útreiðslujáttan	25.721	23.891	24.487	24.938	26.220
Inntøkujáttan	109				
Útreiðslur	25.721				
Lønir	18.335				
Annað	7.386				
Inntøkur		109			

Aðrir viðgerðastovnar

Sum nýggj budgettsundurgreining verður innsett:

"Budgettsundurgreining

tús. kr. 1992	1993	1994	B 1995	F 1996
Útreiðslujáttan			8.400	8.400
Útreiðslur			**8.400**	**8.400**
Blákrossheimið				4.000
Heilbrigdi				4.400

§ 9 Útbúgving og gransking

A. Yvirlit

Játtanaryvirlit

Tásund kr.	Nettotal	Útreiðslur	Inntøkur
Útreiðslujáttan	1.175	1.475	300

Miðnámsútbúgvingar	180	-
Felagsútreiðslur	-	-
Hægri útbúgvingar og gransking	1.295	300

B. Játtanir

		Útreiðstur	Inntøkur	
Miðnámsútbúgvingar				
	Viðlíkahald - Tekniski Skúli, Klaksvík (Rakstrarjáttan)	F	500	-
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	**BU**	**180**	-
	Játtanin hækkað við kr. 180.000.			
Felagsútreiðslur				
14864	Skúlabókaútgáva (Rakstrarjáttan)	F	3.661	-
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	**BU**	**1.000**	**1.000**
	Nettotøl broytt til bruttotøl			
Hægri útbúgvingar og gransking				
14466	Føroya Sjómannaskúli (Rakstrarjáttan)	F	7.423	300
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	**BU**	**700**	-
	Játtanin hækkað við kr. 700.000			
14592	Biofar projektið	F	700	
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	**BU**		
	Broytt nýtsla			

14568	Stovnarnir á Debesartrøð, felagsútreiðslur (Rakstrarjáttan)	F	1.107	-
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	**BU**	**595**	**300**
	Játtanin hækkað við kr. 295. tús. netto í samband við netumsiting			

Viðmerkingar til broytingaruppskotið

Miðnámsútbúgvingar

Viðlíkahald- Tekniski Skúli, Klaksvík (Rakstrarjáttan)
Játtanin skal nýtast til at skifta takið á Tekniska skúla í Klaksvík.

Sum nýggj budgettsundurgreining verður innsett:

"Budgettsundurgreining

tús. kr.	1992	1993	1994	B 1995	F 1996
Útreiðslujáttan			200	500	680
Útreiðslur			**200**	**500**	**680**

Felagsútreiðslur

14864 Skúlabókaútgáva (Rakstrarjáttan)
Broytingin viðførir ikki broytingar í viðmerkingunum.

Hægri útbúgvingar og gransking

14466 Føroya Sjómansskúli (Rakstrarjáttan)

Í viðmerkingunum verður seinasta punktum "Ein møguleiki fyri ... á skúlan á heysti 1996." í reglubrotinum, ið byrjar við "Neyðugt er at keypa ...." strikað.

Sum nýggj budgettsundurgreining verður innsett:

"Budgettsundurgreining

tús. kr.	1992	1993	1994	B 1995	F 1996
Útreiðslujáttan	7.205	6.953	7.534	7.423	8.069
Inntøkujáttan	749	409	366	300	300
Útreiðslur	**7.205**	**6.953**	**7.534**	**7.423**	**8.069**
Lønir	5.929	6.076	6.149	6.230	6.230
Annað	1.276	877	1.394	1.193	1.839
Inntøkur	**749**	**409**	**409**	**300**	**300**

14592 Biofar projektið
Sum nýggj budgettsundurgreining verður sett:

Budgettsundurgreining

tús. kr.	1992	1993	1994	B 1995	F 1996
Stuðul			702	654	700

Starvsfólkayvirlitið verður strikað.

14568 Stovnarnir á Debesartrøð, felagsútreiðslur (Rakstrarjáttan)
Hetta verður innsett sum nýtt reglubrot:

"Ein teldusérfrøðingur varð settur í starv á Fróðskaparsetrinum 1. september 1994, fyri at ansa eftir og stýra teldusamskiftinum millum stovnarnar á Debesartrøð, aðrar skúlar og stovnar og sambandinum út í heim.

Tað, sum higartil er gjørt, er, at bygdur er ein infrastrukturur til samskifti millum stovnarnar og útheimin. Tað, sum liggur á lánl, er at fáa Fornminnissavnið í Høyvík, Fiskirannsóknarstovuna og eina deild hjá Fróðskaparsetrinum við í netið.

Arbeiðið hjá netumsitaranum verður fyrst og fremst at síggja til, at raksturin av sendinetinum verður í lagi, nú infrastruktururin næstan er liðugt uppbygdur, t.d. hava umsjón við útgerðini, stuðla og leiðbeina brúkarum og samskipa og tillaga teksktir og myndir, sum eru at finna í skjølum, skráum osfr.

Netumsitingin hevur ein fíggjartørv upp á 595.000,- kr. í 1996, sum eftir ætlan skulu fíggjast soleiðis: Játtan á fíggjarlógini 295.000,- kr. Inntøkur fyri tænastur 300.000,- kr. Leggið til merkis, at størri partur av útreiðslunum verður fíggjaður við gjaldi fyri tænasturnar."

Sundurgreining av broytingaruppskotinum.

Sundurgreining av broytingaruppskotinum

tús. kr.	F 1996
Útreiðslujáttan	595
Inntøkujáttan	300
Útreiðslur	**595**
Lønir	345
Annað	250
Inntøkur	**300**

Broyting í starvsfólkayvirlitið

	1996
Tal av fulltríðarstørvum	**0,5**
Húsavørður	-
Netumsitari	0,5
í alt	**0,5**
Endurskoðað játtan	
Starvsfólk í alt	2,5

§ 10 Mentan

A. Yvirlit

Játtanaryvirlit

Tús. kr.	Nettotal	Útreiðslur	Inntøkur
Útreiðslujáttan	500	650	150
Varðveitan og kunnan um mentannararvin ...		**650**	**150**

B. Játtanir

			Útreiðslur	Inntøkur
Varðveitan og kunnan um mentannararvin.				
15703	Føroya Náttúrugripasavn (Rakstrarjáttan)	F	3.677	-
	Hjá fíggjarnevndarmeirflutanum	BU	**650**	**150**
	Játtanin hækkað við kr. 500 tús. Nettotøl broytt til brutotøl.			

Viðmerkingar til broytingaruppskot

Varðveitan og kunnan um mentannararvin

15703 Føroya Náttúrugripasavn (Rakstrarjáttan)
Sum fjórða reglubrot í viðmerkingunum verður innsett:

"Síðan undirgrundin varð yvirtikin í 1992, hevur Jarðfrøðissavnið havt ábyrgdina av øllum jarðfrøðiligum spurningum og kanningum.

Jarðfrøðissavnið lekur sær av ymiskum uppgávum, sum Oljufyrisitingin hevur tørv á at fáa avgreitt, í tilknýti til fyrireikingar fram ímóti einum veruligum oljuleitingarskeiði við Føroyar. Fyrireikingarnar verða vænt-andi lidnar í 1996, og loyvi til veruligar oljuleitingar kunnu væntandi gevast í 1997 ella 1998.

Forkanningarnar av føroyska undirgrundini hava verið meira umfatandi og hava gingið skjótari enn roknað varð við. Gjørdar eru seismiskar kanningar, kanningar frá flogfari, umframt aðrar vísindaligar kanningar. Jarðfrøðissavnið skal í hesum sambandi skríseta og goyma og tulka alt kanningartiltarið til tess at staðfesta, hvørji øki eru áhugaverd, til bjóðast skal út til veruligar oljuleitingar.

Um kunnleikin til føroyska undirgrundina skal verða nøktandi stóði frá føroyskari síðu, og kanningar varð-veitast á tryggum hátt, verður neyðugt at hækka at hækka játtanina við netto kr. 726 tús. fyri 1996."

Sum nýggj budgettsundurgreining verður innsett:

Budgettsundurgreining

Tús. kr.	1992	1993	1994	B 1995	F 1996
Útreiðslujáttan	3.515	3.300	3.637	3.581	4.327
Inntøkujáttan	100	142	166	130	150
Útreiðslur	**3.515**	**3.330**	**3.637**	**3.581**	**4.327**
Lønir	2.793	2.352	2.773	2.920	3.252
Annað	722	978	864	661	925
Inntøkur	**100**	**142**	**166**	**130**	**150**

§ 13 Fiski, ali- og sjóvinna

A. Yvirlit

Játtanaryvirlit

Túsund kr.	Nettotal	Útreiðslur	Inntøkur
Útreiðslujáttan	-8.983	-8.983	-
Tænasta og eftirlit		**360**	**-**
Vinnuframi		**-9.343**	

B. Játtanir

			Útreiðslur	Inntøkur
Tænasta og eftirlit				
	Veðurtænasta DMI (Íløgujáttan)	F	360	-
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum (Nýtt rukstrarstuð)	**BU**	-	-
	Játtaðar verða 360 tús. til nótfinansgerð av veðurupplýsingartænastuni			
16301	Fiskiveiðieftirlit. Vaktar- og Bjargingartænastan (Rakstrarjáttan)	F	20.902	2.500
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	**BU**	**500**	**-**
	Játtan hækkað við kr. 500.000 í samb. v. setan av nýggjum veðurlýðingi			
Vinnaframi				
17034	Fiskasjúkutænastan (Rakstrarjáttan)	F	1.400	
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	**BU**	**- 343**	**-**
	275.000 verða fluttar til § 15, 17015 Landsdjóralæknaembætið, og 68.000 verða spardar í sambandi við umskipan av landsdjóralæknaembætinum. Játtanarslagið verður broytt til "Onnur játtan".			
18584	Menning av fiskivinnu á landi	F	18.000	-
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	**BU**	**- 9.000**	**-**

Viðmerkingar til broytingaruppskot

Tænasta og eftirlit

Veðurtænasta DMI (Ílogujáttan)
Nýtt rakstrarstað

Játtanin skal nýtast til nútímansgerð av veðurupplýsingartænastuni.

16301 Fiskiveiðueftirlit, Vaktar- og Bjargingartænastan (Rakstrarjáttan)

Sum nýtt seinasta reglubrot eftir "Stovnurin skal beinanvegin .... fyri samlaðu játtanina" verður innsett:

"Eingin veðurtænasta hevur verið, síðani veðurfrøðingurin fór frá fyri aldur, tískil verða kr. 500 tús. settar av til setan av nýggjum veðurfrøðingi á Vaktar- og Bjargingartænastuni."

Sum nýggj budgettsundurgreining verður innsett:

"Budgettsundurgreining

tús. kr.	1992	1993	1994	B 1995	F 1996
Útreiðslujáttan	19.558	19.019	19.229	19.100	21.402
Inntøkujáttan	3.903	3.465	3.808	3.000	2.500
Útreiðslur	**19.558**	**19.019**	**19.229**	**19.000**	**21.402**
Lønir	12.644	11.991	12.304	12.410	14.712
Annað	6.729	7.552	7.591	6.690	6.690
Inntøkur	**3.903**	**3.465**	**3.808**	**3.000**	**2.500**
Sjóvátrygging	3.000	3.000	3.000	2.500	2.000
Sleip v.m.	765	181	666	400	400
Søla av sjókortum v.m.	138	283	141	100	100

Vinnuframi

17037 Fiskasjúkutænastan
Broytingaruppskotið viðførir hesar broytingar í viðmerkingunum í 16907/333407 Tiltøk fyri alivinnuna:

Í fyrsta reglubroti verður "Fiskasjúkutænasta ..... 1,4 mió. kr." strikað.

Tvey tey seinastu reglubrotini detta burtur.

Til **17037 Fiskasjúkutænastan** verða innsettar hesar viðmerkingar:

"Ætlanin er at umleggja fiskasjúkutænastuna soleiðis, at hon verður privat við almennum stuðfi. Skipanin kemur at virka soleiðis, at fiskasjúkutænastan fær eina játtan upp á kr. 1.057 mió. árliga á fíggjarlógini, og haraftrat verður møguligt at taka gjald fyri tænastur. Gjaldið skal góðkennast av landsstýrinum.

Landsstýrið tryggjar sær í einum sáttmála, at øll øki í Føroyum fáa eins góðar somdir.

Budgettsundurgreining

tús. kr.	1992	1993	1994	B 1995	F 1996
Útreiðslujáttan	-	-	-	-	1.057

18584 Menning av fiskivinnu á landi
Seinastu tølini benda á, at nýtslan bert verður helmingurin av játtanini fyri 1995, og verður játtanin fyri 1996 samsvarandi lækkað.

Sum nýggj budgettsundurgreining verður innsett:

Budgettsundurgreining

tús. kr.	1992	1993	1994	B 1995	F 1996
Útreiðslujáttan	-	-	-	19.000	9.000

§ 14 Vinnulív

A. Yvirlit

Játtanaryvirlit:

Túsund kr.	Nettotal	Útreiðslur	Inntøkur
Útreiðslujáttan	300	350	50

Felagsútreiðslur	50	50
Ymiskir grunnar og stuðulsskipanir	300	-

B. Játtanir

			Útreiðslur	Inntøkur
Felagsútreiðslur				
18361	Menningarstovan (Rakstrarjáttan)	F	2.189	-
	Hjá figgjarnevndarmeirilutanum	**BU**	**50**	**50**
	Nettotøl broytt til bruttotøl			
Ymiskir grunnar og stuðulsskipanir				
	Framtak fyri útlendskar fløgur	F	500	-
	Hjá figgjarnevndarmeirilutanum	**BU**	**50**	**50**
	Játtanin skal nýtast til fløguráðgevarar, ið arbeiða fyri at fáa útlendskar fløgur til Føroya.			

Viðmerkingar til broytingaruppskot

Felagsútreiðslur

18361 **Menningarstovan** (Rakstrarjáttan)
Broytingin viðførir ikki broytingar í viðmerkingunum.

Ymiskir grunnar og stuðulsskipanir

Framtak fyri útlendskar íløgur
Viðmerkingarnar verða strikaðar.

Sum nýggj budgettsundurgreining verður innsett:

"Budgettsundurgreining

tús. kr.	1992	1993	1994	B 1995	F 1996
Útreiðslujáttan					800

§ 15 Landbúnaður

A. Yvirlit

Játtanaryvirlit:

Túsund kr.	Nettotal	Útreiðshr	Inntøkur
Útreiðslujáttan	275	275	-

Felagsútreiðslur	**321**	**321**
Eftirlit og tænastur	**275**	**-**

B. Játtanir

			Útreiðslur	Inntøkur
Felagsútreiðslur				
17307	Skógrøkt landsins (Rakstrarjáttan)	F	1.392	-
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	**BU**	**321**	**321**
	Nettotøl broytt til bruttotøl.			
Eftirlit og tænastur				
17015	Landsdjóralæknaembætið (Rakstrarjáttan)	F	640	-
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	**BU**	**275**	**-**
	275.000 verða flutt frá § 13. 17034 Fiskasjúkutænastan í sambandi við umskipan av landsdjóralæknaembætinum, j.b. BU til § 13. 17034			

Viðmerkingar til broytingaruppskot

Felagsútreiðslur

17307 Skógrøkt landsins (Rakstrarjáttan)
Sum nýggj budgettsundurgreining verður innsett:

Budgettsundurgreining

tús. kr.	1992	1993	1994	B 1995	F 1996
Útreiðslujáttan	2.125	1.713	1.711	1.521	1.713
Inntøkujáttan	693	418	492	321	321
Útreiðslur	**2.125**	**1.713**	**1.711**	**1.521**	**1.713**
Lønir	974	947	1.100	991	1.142
Annað	1.151	766	611	530	571
Inntøkur	**693**	**418**	**492**	**321**	**321**

Eftirlit og tænastur

17015 Landsdjóralæknaembætið (Rakstrarjáttan)
Í viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið fyri 1996 undir rakstrarstøð 17015 Landsdjóralæknaembætið var viðmerkt, at einki uppskot til fíggjarlóg er komið frá stovninum, tá eingin landsdjóralækni hevur verið settur seinastu tíðina.

Í oktober 1995 tók nýggi landsdjóralæknin við starvi. Heitt varð beinanvegin á hann um at senda uppskot til fíggjarlóg til landsstýrið, soleiðis at hetta kundi takast við í viðgerðina.

Uppskot landsstýrisins verður sostatt, at kr. 915.000 verða játtaðar stovninum í 1996 við (eirri grundgeving, at Fiskasjúkutænastan og landsdjóralæknin, hóast tvey rakstrarstøð hava verið rikin sum ein økonomisk eind, og at landsdjóralæknastovurin hevur tørv á eini hægri játtan enn tann, ið landsstýrið áður hevur skotið upp.

Í viðmerkingarnar verður innsett:

Orsakað av, at landsdjóralæknin skal undir at fyrireika djóralæknalóg og gera aðrar ajourføringar av lógum innan djóralæknaøkið, hevur hann í hesum sambandi tørv á einum heiltim starvsfólki.

Hækkan av játtanini til landsdjóralæknan merkir ikki eina økta játtan á fíggjarlógini sum so, men eina flytan frá játtanini til Fiskasjúkutænastuna."

Broytingin kann gerast soleiðis, at munurin millum 915.000 kr. og 640.000 kr. t.v.s. 275.000 kr. skulu flytast frá 17034 fiskasjúkutænastan, ið hevur 1,4 mió. í uppskoti. Tørvur á játtan til Fiskasjúkutænastuna fyri 1996 verður 1.057.000 kr. sostatt verða 68.000 kr. spardar.

Sundurgreining av broytingaruppskotinum

tús. kr.	F 1996
Útreiðslujáttan	275
Inntøkujáttan	-
Útreiðslur	**275**
Løntir	161
Annað	114
Inntøkur	**-**

Broyting í starvsfólkayvirlitinum

	1996
Stjóri	-
Skrivstovufólk	0,5
Í alt	**0,5**
Endurskoðað játtan	
Starvsfólk í alt	2

§ 16 Samferðsla og samskifti

A. Yvirlit

Játtanaryvirlit

Túsund kr.	Nettotal	Útreiðslur	Inntøkur
Útreiðslujáttan	- 3.494	22.406	25.900
Løgujáttan	13.000	13.500	500

Vegir og havnir	34.406	26.400
Flogferðsla	-	-
Samskifti	1.500	-

B. Játtanir

			Útreiðslur	Inntøkur
Vegir og havnir				
11901	Landsverkfrøðingsskrivstovan (Rakstrarjáttan)	F	7.450	-
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	**BU**	**700**	**700**
	Nettotøl broytt til bruttotøl			
	Hald av landsvegum (Rakstrarjáttan)	F	66.100	25.200
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum (Nýtt rakstrarstuð)		-	
	Viðlíkahald av landsvegum, herundir framleiðsla av skerv- og asfaltvørum. Upphæddin er flutt frá rakstrarstøðunum nr. 13056 og 13094, ið samstundis verða niðurløgd, og nettotøl verða broytt til bruttotøl.			
13018	Nýgerð av landsvegum (Fløgujáttan)	F	15.000	-
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	**BU**	**12.000**	**500**
	Nettotal broytt til bruttotøl, játtanin hækkað við kr. 8 mió., og 3,5 mió. flutt ár frá 13056 og 13094.			
13023	Havnagerð	F	7.000	-
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	**BU**	**-900**	**-**
	Kontobeitið verður broytt til "Havnir" og játtanarslagið broytt til rakstrarjáttan. Fluttar verða kr. 900 tús. til nýtt rakstrarstað "Studningur til havnir".			
13037	Lendingar	F	3.000	-
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	**BU**	**-3.000**	**-**
	Rakstrarstaðið niðurlagt og upphæddin flutt til aðrar partar av greinini j.b. uppskot um nýtt rakstrarstað "Studningur til havnir".			
13056	Fyritøkur og útgerð hjá LVF (Rakstrarjáttan)	F	24.000	-
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	**BU**	**-24.000**	**-**
	Rakstrarstaðið niðurlagt og upphæddin flutt til aðrar partar av greinini j.b. uppskot um nýtt rakstrarstað "Hald av landsvegum", tó j.b. 13018 "Nýgerð av landsvegum".			
13075	Asfaltering, kommunur	F	4.400	-
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	**BU**	-	-
	Kontoheitið verður broytt til "Kommunalir vegir. Asfaltering". Nýggjar viðmerkingar innsettar.			

	Kommunalir vegir. Studningur (Nýtt rakstrarstað)	F	-	-
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum		**-**	**-**
	Nýggjar viðmerkingar innsettar			
13094	Rakstur av veganeti (Rakstrarjáttan)	F	21.894	-
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	**BU**	**-21.894**	-
	Rakstrarstaðið niðurlagt og upphæddin flutt til aðrar partar av greinini j.b. uppskot um nýtt rakstrarstað "Hald av landsvegum", tó j.b. 13018 "Nýgerð av landsvegum"			
	Studningur til havnir (Áteckning)	F	5.400	-
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum (Nýtt rakstrarstað)		**-**	**-**
	Studningur til havnir og lendingar. Upphæddin er flutt heilt ella partvíst frá rakstrarstøðunum 13023, 13037, 13056 og 13094.			
Flogferðsla				
13042	Flogferðsla	F	1.300	-
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	**BU**	**-3.000**	**-**
	Rakstrarstaðið niðurlagt og upphæddin flutt til aðrar partar av greinini, j.b. "Flogferðsla (Rakstrarjáttan), Flogferðsla (Lógarbundin játtan) og Flogferðsla (Íløgujáttan)			
	Flogferðsla (Rakstrarjáttan)	F	-	-
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	**BU**	**600**	**-**
	Nýtt rakstrarstað, peningur fluttur j.b. 13042 "Flogferðsla". Nýggjar viðmerkingar innsettar.			
	Flogferðsla (Lógarbundin játtan)	F	-	-
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	**BU**	**900**	**-**
	Nýtt rakstrarstað, peningur fluttur j.b. 13042 "Flogferðsla". Nýggjar viðmerkingar innsettar.			
	Flogferðsla (Íløgujáttan)	F	-	-
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	**BU**	**1.500**	**-**
	Nýtt rakstrarstað, peningur fluttur j.b. 13042 "Flogferðsla". Nýggjar viðmerkingar innsettar.			
Samskifti				
13125	Útvarpssendistøðir (Rakstrarjáttan)	F	500	-
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	**BU**	**3.000**	**-**
	Játtanin hækkað við kr. 1,5 og kr. 1,5 mió. fluttar frá 13989. Heitið á rakstrarstaðnum verður brotið til "Útvarps- og Sjónvarpssendistøðir".			

13989	Útvarps- og Sjónvarpsstøðir Rakstrarjáttan)		1.500	-
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum Rakstrarstaðið strikað. Upphæddin flutt til 13125.	**BU**	**-1.500**	**-**
	Útvarps- og Sjónvarpsstøðir (Íløgujáttan)	F	5.000	-
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum Broytt nýtsla	**BU**	-	**-**

C. Átekning

13037 Lendingar

Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum

Átekningin verður broytt til:

"Studningur til havnir:
Landsverkfrøðingurin verður av hesum rakstrarstaði heimilað at útgjalda studning sambært longu givnum tilsøgnum til líðugtgerð av arbeiðnum, sum eru íverksett. Studningurin verður útgoldin sambært teimum havna- og leningajáttanum, ið Løgtingið hevur samtykt frammanundan.

Landsverkfrøðingurin verður eisini heimilað at gjalda 90% av upp til kr. 900. tús. til framhald av arbeiði upp á lendingina á Kirkju."

Viðmerkingar til broytingaruppskot

Vegir og havnir

Høvuðsyvirlit yvir vegir og havnir.

Høvuðsyvirlit

Túsund kr.	1992	1993	1994	1995	1996
Netto	226.900	153.500	117.500	106.400	85.750
Útreiðslur	**269.700**	**176.700**	**142.500**	**131.100**	**112.150**
Lønir	73.300	57.500	46.300	46.100	42.750
Annað	196.400	119.200	96.200	85.000	69.400
Inntøkur	**42.800**	**23.200**	**25.000**	**24.700**	**26.400**
Útgreinan av útreiðslum					
Lv-skrivstovan	11.100	9.400	8.900	8.900	8.150
Landsvegir	154.400	112.700	91.900	89.300	85.100
Havnir	92.600	44.400	32.400	22.500	11.500
Flogferðsla	1.100	1.200	1.300	3.000	3.000
Kommunalir vegir	10.500	9.000	7.400	7.400	4.400
Útgreinan av inntøkum					
Lv-skrivstovan	1.200	600	600	600	700
Landsvegir	41.600	22.600	22.600	24.100	25.700

Starvsfólkayvirlit (Fyri stovnin)

	1992	1993	1994	1995	1996
Ársverk	354	283	221	217	200
Fastlønt	126	110	90	83	80
Tímalønt	228	173	131	134	120

11901 Landsverkfrøðingsskrivstovan (Rakstrarjáttan)

Stovnurin, t.e. landsverkfrøðingurin, skal vegna Føroya Landsstýri taka sær av:

- Útbygging og hald av landsvegunum.
- Málum viðvíkjandi havnum og røkt av sundum og firðum, sum nærri er sagt frá undir havnum.
- Flogvallar- og tyrlupallamálum í tann mun, landið tekur sær av hesum.
- Málum viðvíkjandi kommunalum vegum, har landið er við.
- Brunaumsjón landsins, sambært lóg.
- Ymsum øðrum tøkniligum málum fyri land og kommunur.

Útreiðslur til høvuðsleiðslu, skrivstovu- og bókhald, edv- og aðrar internar tænastur og Brunaumsjón landsins.

Budgettsundurgreining

Túsund kr.	1992	1993	1994	1995	1996
Útreiðslujáttan	11.100	9.400	8.900	8.900	8.150
Inntøkujáttan	1.200	600	600	600	700
Útreiðslur	**11.100**	**9.400**	**8.900**	**8.900**	**8.150**
Lønir	8.300	7.000	6.500	6.500	5.750
Annað	2.800	2.400	2.400	2.400	2.400
Inntøkur	**1.200**	**600**	**600**	**600**	**700**

Hald av landsvegunum (Rakstrarjáttan)

Endamálið við játtanini er at servisera kundarnar - trafikantarnar - á einum støði, sum samfelagið metir rímligt og at halda vegirnar, so tað virði, sum er lagt í hesar, í mest møguligan mun verður varðveitt.

Við tað at stovnurin eisini er tann einasti, sum framleiðir skerv- og asfaltvørur, fylgir harav skyldan at tena privatum og almennum á hóskandi hátt.

Budgettsundurgreining

Túsund kr.	1992	1993	1994	1995	1996
Útreiðslujáttan	85.500	64.900	62.500	62.500	66.100
Inntøkujáttan	38.200	21.800	23.800	23.600	25.200
Útreiðslur	**85.500**	**64.900**	**62.500**	**62.500**	**66.100**
Lønir	37.400	30.300	28.100	29.000	29.000
Annað	48.100	34.600	34.400	33.500	37.100
Inntøkur	**38.200**	**21.800**	**23.800**	**23.600**	**25.200**
Tænastur og veitingar	24.000	10.500	14.200	10.900	13.400
Kommununnar partur	14.200	11.300	9.600	12.700	11.800

Virksemisyvirlit

Mió. kr.	1992	1993	1994	1995	1996
Vanligt hald	15,2	13,6	13,9	14,3	14,3
Vetrarhald	4,8	4,0	4,8	5,2	4,6
Asfaltering	4,7	7,5	4,7	6,0	6,0
Annað		19,6	17,1	16,2	15,0
16,7					
Skerv-(asfaltverk	41,2	22,7	22,9	22,0	24,5
Tilsamans	85,5	64,9	62,5	62,5	66,1

13018 Nýgerð av landsvegum (Íløgujáttan)
Endamálið við játtanini er at skapa eitt effektivt og trygt ferðsluumhvørvi, sum so vítt gjørligt nær øllum landsins íbúgvum, við atliti til teir teknisku og búskaparligu møguleikar, tøkir eru til eina og hvørja tíð.

Budgettsundurgreining

Túsund kr.	1992	1993	1994	1995	1996
Útreiðslujáttan	68.900	47.800	29.400	26.800	27.000
Inntøkujáttan	3.400	800	600	500	500
Útreiðslur	**68.900**	**47.800**	**29.400**	**26.800**	**27.000**
Lønir	25.700	18.100	10.000	9.100	10.000
Annað	43.200	29.700	19.400	17.700	17.000
Inntøkur	**3.400**	**800**	**600**	**500**	**500**
Tænastur og veltingar	**3.400**	**800**	**600**	**500**	**500**

Virksemisyvirlit

Túsund kr.	1992	1993	1994	1995	1996
Ábøtur	6.400	5.500	3.800	3.500	3.500
Nýgerðir:					
Våg-Lopra-Sunba	10.160	9.662	6.419	7.000	6.500
Tvøroyri-Øravík	466	288	-	-	-
Vegagerð í Sandoy	254	511	-	-	-
Vegagerð í Vágum	3.608	1.637	2.904	2.000	1.500
Sund-Kollafjørður	25.273	2.253	-	-	-
Tórshavn-Velbastaður	3.347	2.517	-	-	-
Gamlaræt-Tórshavn					3.000
Hvítanesvegurin	1.551	1.037	1.527	1.500	1.500
Kollafjørður-Hósvík	3.002	3.034	3.325	3.100	2.000
Sjógv-Strendur	3.428	2.333	132	500	-
Oyri Eiði	1.189	3.589	1.942	300	
Funning-Funningsfjørð	989	1.270	108	-	-
Fjarðavegurin	63	1.966	1.097	2.000	4.000
Klaksvík Norðoyri	409	1.987	1.961	1.500	-
Klaksvík-Kunoy	269	1.092	313	-	-
Vegagerð í Kallsoy	576	1.857	1.141	700	1.500
Vágatunnilin	326	460	671	600	500
Felags at taka til	7.536	6.888	4.090	4.100	3.000
Tilsamans	68.900	47.800	29.400	26.800	27.000

Viðmerkingar
Av teimum kr. 6,5 mió. til vegna Vág-Lopra-Sumba skulu kr. 1 mió. nýtast til vegin Vág-Lopra og kr. 2 mió. til bergholið Lopra-Sumba.

Undir heitið ábøtur koma tær greinir, sum fyri itu: st. ábøtur, trygdurtiltøk og vegastokkur.

Útreiðslur til nýgerðir av landsvegum eru tú annars allar í einum, bæði vegir og tunlar.

Allar útreiðslurnar fyri Amboð og Skerv-/Asfaltverk eru lagdur undir hald av landsvegum. Í tí interna bókhaldinum verður hildið skil á, hvussu nógv av veitingum og tænastum hiðani verða nýttar av nýgerðunum fyri hvørt arbeiði sær, so altíð er møguleiki fyri at finna út av samlaða "kostnaðinum" fyri hvørt arbeiði. Tað er rætliliga ymist, hvussu stór "yvirflytingin" er fyri hvørt arbeiði, alt eftir hvat gjørt verður, men í meðal kann roknast út, at eini 30% kunnu leggjast aftarat nýgerðarkostnaðinum.

13075 Kommunalir vegir, asfaltstudningur

Verður latin kommununum, sum ávíst krónutal pr. íbúgva - tey seinastu árini 100 kr./íbúgva - fyri at halda teimum til at asfaltera veginar, soleiðis at tað samlaða vegakervið - landsvegir og kommunalir vegir - verður hildið á einum jøvnum støði.

Ikki nýttar játtanir verða flutar til árið eftir. Játtaða upphæddin hjá eini lítlari kommunu eitt ávíst úr er ov lítil tilat farast kann undir líkinda asfaltering. Tí er neyðugt at "goymna" játtanir nøkur ár fyri at hava nóg mikið. Annað vildi verið sera ópraktiskt.

Budgettsundurgreining

Túsund kr.	1992	1993	1994	1995	1996
Útreiðslujáttan	5.500	4.600	4.900	4.400	4.400

Kommunalir vegir, studningur

Av hesi játtan hevur verið latin studningur til bygging/umbygging av kommunalum vegum, sum eru partur av heildar samferðsluleið sambært løgtingssamtykt frá 14. apríl 1973 og til kommunalar bústaðar- og dyrkingarvegir eftir beinleiðis játtan við løgtingssamtykt eftir tilmæli frá samferðslunevndini á hvørjum ári fram til 1991.

Budgettsundurgreining

Túsund kr.	1992	1993	1994	1995	1996
Útreiðslujáttan	5.000	4.400	3.100	3.000	0

13023 Havnagerð

Kontoheitið verður broytt til:
"Havnir (Rakstrarjáttan)"

Viðmerkingarnar verða broyttur til:

"Játtanin er ætlað til:

- Hald av ferjulegunum, ið landið eigur á Gomlurætt og við Oyrargjógv, og ferjulemmunum á leini kommunalu ferjulegunum v.m.
- Hald av annodum samhørt løgtingslóg nr. 24 frá 9. mai 1968.
- Fysiska planlegging á firðum og sundum og útvegun av neyðugari vitan í besuni sambandi, so sum veðurmátingar og annað kannitgararbeiði.
- At tryggja, at sum mest fæst burtur út havnafløgunum kring landið og umsiting av studningsjáttanum til kommunal havnaarbeiði.
- Viðgerð í sambandi við leigumál á havnaøkjum.
- Samstarv við Farvandsvæsenet um avmerkingar í sambandi við nýtslu av sjóøkinum innan landoddarnar.
- Fysisk planlegging í sambandi við aling á sjónum.
- At veita kommununum tænastur í samband við rakstur og hald av havnum og lendingum.

Budgettsundurgreining

Túsund kr.	1992	1993	1994	1995	1996
Útreiðslujáttan	6.100	4.600	6.400	6.100	6.100
Útreiðslur	**6.100**	**4.600**	**6.400**	**6.100**	**6.100**
Annað	1.900	2.100	1.700	1.500	1.700
Lønir	4.200	2.500	4.700	4.600	4.400

Havnir

Játtanin er ætlað til havnabyggingar, sum landið fíggjar 100%, studning til kommunalar havnafløgur og lendingar.

Budgettsundurgreining

Túsund kr.	1992	1993	1994	1995	1996
Útreiðslur	86.500	39.800	26.600	16.400	5.400

Flogferðsla

Flugferðsla (Rakstrarjáttan)

Útreiðslurnar fara til hald av hangarinum í Vágunum, tyrlupallunum kringlandið sambæri skrivi landsstýrisins frá 24. januar 1995 og av parkeringsøkinum frammanfyri farstøðina í Vágunum.

Budgettsundurgreining

Túsund kr.	1992	1993	1994	1995	1996
Útreiðslujáttan	200	100	600	300	600
Útreiðslur	**200**	**100**	**600**	**300**	**600**
Lønir	0	0	0	0	300
Annað	200	100	600	300	300

Flogferðsla (Lógarbundin játtan)

Útreiðslurnar fara til endurgjald av toll- og MVG-útreiðslum hjá Statens Luftfejsvæsen í gunum sambæri avtalu frá 26. apríl 1963 og dagføring av hesi við skrivi frá landsstýrinum 3. december 1992.

Budgettsundurgreining

Túsund kr.	1992	1993	1994	1995	1996
Útreiðslujáttan	900	1.100	700	1.700	900

Flogferðsla (Føgujáttan)

Fyri at tyrlupallarnir kring landið skulu lúka tey krøv, sum sett verða av loftferðslumyndugleikunum, verður neyðugt at útbyggja hesar.

Farið er undir arbeiðið, og væntast tað at fara í eini 4 ár.

Budgettsundurgreining

Túsund kr.	1992	1993	1994	1995	1996
Útreiðslujáttan	0	0	0	1.000	1.500

Samskifti

13125 Útvarpssendistøðir (Rakstrarjáttan)

Rakstrarheitið verður broytt til "**13125 Útvarps- og sjónvarpssendinetið** (Rakstrarjáttan".
Sum nýggjar viðmerkingar verður innsett:

"Játtanin fer til rakstur og neyðugt viðlíkahald av útvarps- og sjónvarpssendistøðunum.

Uppskotið til nýggja løgtingslóg um útvarp og í uppskoti til nýggja løgtingslóg um sjónvarp, yvirtekur landsstýrið útvarps- og sjónvarpssendinetið og ber allan kostnaðin av hesum, og skal Telefonverk Føroya Løgtings reka sendinetið. Útvarpið og Sjónvarpið hava skyldu til at luttaka í tilbúgvingaretlanum fyri landið.

Áhaldandi trupulleikar hava verið við at fíggja raksturin av sendinetinum, ognarviðurskiftini eru ógreið, og ógreiða hevur verið um heimildir Telefonverksins at disponera yvir peninginum. Við nýggju lógaruppskotunum verður greiða á spurningunum um fígging, ogn, ábyrgd og heimild. Ein varandi loysn allir partar taka undir við.

Upprunaliga var rakstrarstaðið undir landsstýrinum, sum rindaði allan raksturin. Í 1993 varð rakstrarstaðið flutt til útvarpið, sum síðani fekk ískoyti til raksturin á fíggjarlógini.

Til tess at fíggja raksturin av sendinetinum, varðveitir rakstrarstaðið núverandi játtan upp á 500.000,- kr., umfram at 1 mió. kr. verða játtaðar afturat til endamálið."

Undir fyrireikingunum av uppskotinum til fíggjarlóg fyri fíggjarárið 1996, varð 1 mió. kr. tikin av játtanini til Sjónvarpið á § 10 mettan, tí ætlanin varð, at upphæddin skuldi nýtast til rakstur av sendinetinum. Hetta varð eisini avtalað við leiðslunna í Sjónvarpinum, soleiðis at ein loysn fekst á trupulleikunum við sendinetinum. Av misgáum kom hetta ikki við í fíggjarlógaruppskotinum fyri 1996.

Sum nýggj budgettsendurgreinin verður innsett:

Budgettsundurgreining

tús. kr.	1992	1993	1994	B1995	F1996
Útreiðslujáttan	-	494	500	500	3.500
Útreiðslur	-	494	500	500	3.500

13989 Útvarps- og sjónvarpssendistøðir (Rakstrarjáttan)
Rakstrarstaðið strikað, og peningurin fluttur til 13125 **Útvarps- og sjónvarpssendistøðir**.

Útvarps- og sjónvarpssendistøðir (Íløgujáttan)
Sum nýggjar viðmerkingar verður innsett:

"Helvtin av upphæddini 2,5 mió. kr. fara til at gjalda Telefonverkinum fyri millumbylgjusendaran á Akra byrgi og fyri ognartøku av lendinum rundan um sendaran. Seinusta gjald fyri millumbylgjusendaran upp á 2,5 mió. kr. verður sostatt útsett til 1997.

Ein partur av sendinetsútbúnaðinum er í so ringum standi, at vandi er fyri, at hann heldur uppat at virka. Harumframt sæst sjónvarpið ikki, og hoyrist útvarpið ikki allastaðni í landinum.

Telefonverkið hevur í hesum sambandi gjørt eina trý ára ætlan fyri íløgur upp á alt 5 mió. kr., har ætlanin er at útskifta tann partin av úthúnaðinum, sum er í vánligasta standi, og gera tær íløgur, sum eru neyðugar til tess, at allir borgarar í landinum fáa møguleika at sígggja sjónvarpið og hoyra útvarpið.

Í 1996 verða 2,5 mió. settar av til íløgur, í 1997 verða 1,5 mió. kr. settar av til endamálið og í 1998 1 mió. kr.

Budgettsundurgreining

tús. kr.	1992	1993	1994	B 1995	F 1996
Útreiðslujáttan	-	3.000	5.483	5.000	5.000
Útreiðslur	-	3.000	5.483	5.000	5.000

§ 17 Arbeiðsmarknaður

A. Yvirlit

Játtanaryvirlit:

Túsund kr. Netotal	Útreiðslur	Inntøkur
Útreiðslujáttan	694	694
Felagsútreiðslur.....	**694**	**694**

B. Játtanir

		Útreiðslur	Inntøkur
Felagsútreiðslur			
18369 Javnstøðunevndin (Rakstrarjáttan)	F	175	
Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	BU	-	-
Í viðmerkingunum verður nýggj budgettsundurgreining gjørd.			
18109 Arbeiðseftirlitið (Rakstrarjáttan)	F	2.710	-
Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	BU	694	694
Nettotøl verða broytt til bruttotøl.			

Viðmerkingar til broytingaruppskot

Felagsútreiðslur

18389 Javnstøðunevndin (Rakstrarjáttan)

Budgettsundurgreining

tús. kr.	1992	1993	1994	B 1995	F 1996
Útreiðslujáttan		96	170	150	175
Inntøkujáttan		-	-	-	-
Útreiðslur		96	170	150	175
Lønir		-	-		36
Annað		-	-	-	139
Inntøkur		-	-	-	-

18109 Arbeiðseftirlitið (Rakstrarjáttan)
Broytingin viðførir ikki broytingar í viðmerkingunum.

B. Eftirlønir

A. Yvirlit

Játtanaryvirlit:

Túsund kr.	Nettotal	Útreiðslur	Inntøkur
Útreiðslujáttan	600	600	-
Aðrar eftirlønir	600	-	

B. Játtanir

		Útreiðslur	Inntøkur
Aðrar eftirlønir			
Eftirløn løgtingsins (Lógarbundin játtan)	F	507	-
Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum Nýggjar viðmerkingar innsettar	BU	-	
Eftirløn landsstýrisins (Lógarbundin játtan)	F	93	-
Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum Nýggjar viðmerkingar innsettar	BU	-	-

Viðmerkingar til broytingaruppskot

Aðrar eftirlønir

Niðanfyristandandi konti hava áður havt felagsheitið "20014 Bíðipeningur". Lógirnar um løn til løgtings- og landsstýrismenn vóru broyttar í 1993, og varð skipanin við bíðipeningi samstundis tikin av. Tann seinasta bíðilønin verður útgoldin í august 1996. Nýggja tingskipanin leggur upp til, at tað framyvir verður løgtingsskrivstovan, ið umsitur lønir v.m. til løgtingsmenn.

Eftirlønir til løgtings- og landsstýrismenn verða í framtíðini goldnar av hvør sínum konto.

Budgettsundurgreining

tús. kr.	1992	1993	1994	B 1995	F 1996
Útreiðslujáttan	3.973	2.561	2.053	600	-

Viðmerking:
Omanfyri standandi er sundurgreiningin av tí gamla rákstrarstaðnum.

Eftirløn løgtingsmanna (Lógarbundin játtan)

Budgettsundurgreining

tús. kr.	1992	1993	1994	B 1995	F 1996
Útreiðslujáttan	-	-		-	507

Eftirløn landsstýrismanna (Lógarbundin játtan)

Budgettsundurgreinin

tús. kr.	1992	1993	1994	B 1995	F 1996
Útreiðslujáttan	-	-			93

§ 19 Ósundurgreinaðar sparingar

A. Yvirlit

Játtanaryvirlit

Túsund kr.	Nettotal	Útreiðslur	Inntøkur
Inntøkujáttan	12.000	12.000	-
Ósundurgreinaðar sparingar		12.000	-

B. Játtanir

		Útreiðslur	Inntøkur
Ósundurgreinaðar sparingar			
Ósundurgreindar sparingar	F	-12.000	-
Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	BU	12.000	-
Rakstrarstaðið verður strikað.			

Viðmerkingar til broytingaruppskot

Ósundurgreindar sparingar

Rakstrarstaðið verður strikað.

§ 30 Rentur

A. Yvirlit

Játtanaryvirlit:

Túsund kr.	Nettotal	Útreiðslur	Inntøkur
Útreiðslujáttan	-5.000	-5.000	-
Rentur		**-5.000**	**-**

B. Játtanir

			Útreiðslur	**Inntøkur**
Reutur				
222061	Rentur av landsins skuld	F	503.000	-
63018				
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	BU	-5.000	-
	Nýggj budgettsundurgreining innsett.			

Viðmerkingar til broytingaruppskot

Rentur

22206/163018 Rentur av landsins skuld

Sum nýggj budgettsundurgreining verður innsett:

Budgettsundurgreining

tús. kr.	1992	1993	1994	B 1995	F 1996
Rentuútreiðslur	-	327.071	419.396	484.000	498.000

§ 35 Skattir og avgjøld

A. Yvirlit

Játtanaryvirlit:

Túsund kr.	Nettotal	Útreiðslur	Inntøkur
Inntøkur	5.000	-	5.000
Skattainntøkur (beinleiðis skattir)	**-**	**-55.000**	**-**
Avgjøld og tollur (óbeinleiðis skattir)....	**-**	**60.000**	

B. Játtanir

			Útreiðslur	Inntøkur
Skattainntøkur (beinleiðis skattir)				
1201	Vanligur landsskattur	F		702.000
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	**BU**	**-**	**-53.000**
	Inntøkumetingin verður lækkað til 649 mió. kr.			
1702	Rentuskattur	F	-	48.000
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	**BU**	-	**-2.000**
	Nýggjur viðmerkingar			
Avgjøld og tollur (óbeinleiðis skattir)				
2022	Meirvirðisgjald	F	-	500.000
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	**BU**	**-**	**55.000**
	Inntøkumetingin verður hækkað 555 mió. kr.			
2713	Skrásetingargjald	F	-	25.000
	Hjá fíggjarnevndarmeirilutanum	**BU**	-	**5.000**
	Nýggj budgettsundurgreining innsett.			

Viðmerkingar til broytingaruppskot

Skattainntøkur (beinleiðis skattir)

1201 Vanligur landsskattur
Viðmerkingar verða broyttar til:
"Samtíðarskattur verður kravdur sambært løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt og løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan.

Inntøkuskattur frá fysiskum persónum. Inntøkuskatturin fevnir um:
- landsskatt
- kommunuskatt (herundir atkvinnuskatt)
- kirkjuskatt

Inntøkugrundarlagið fevnir um teir persónar, sum sambært nevndu lóg skulu gjaldaskatt í Føroyum.

Budgettsundurgreining

tús. kr.	1992	1993	1994	B 1995	F 1996
Inntøkujáttan	843.028	754.253	727.278	682.000	649.000

Útrokningargrundarlag

	mió. kr.
Beinleiðis framskriving 741,0	
Regulering vegna lækking av rentuútreiðslunum	8,0
Regulering vegna hækking í rentufrádrátti	- 6,0
Regulering vegna avlopsskatt, úrslitaleysar innheintingar og hækkingar og lækkingar	-15,0
Telefonfrádráttir	-3,0
Hækking av frádrátti hjá pensiónistum	-3,0
Lækking av skattastiga	-80,0
Hækking av barnafrádrátti	-5,5
Lækking av skattahámarki	-2,5
Skattur av virksemisøking orsakað av skattalækkingini	15,0
Samlað meting 1996	649,0

Framrokning
Fyribilsskatturin í teir fyrstu mánaðirnar av 1995 hevur givið kr. 676 mió. Um inntøkan í december verður tann sama sum seinasta ár, verður inntøkan kr. 741 mió. í 1995. Hækkingin av rentufrádráttinum í landsskattinum úr 27 til 31 prosent er innroknað í hesi tøl.

Roknað er við sama búskaparliga virksemi í 1996 sum í 1995.

Regulering vegna rentufrádrátt.
Rentufrádrátturin hækkar í 1996 úr 31 uppí 33 prosent. Hetta minkar skattainntøkurnar við kr. 6 mió.

Regulering vegna avlopsskatt.
Roknast kann við, at munurin millum avlopsskatt og frestandi skatt fer at minka, serliga tá ið hugsað verður um, at rentuupplýsingar framefter skulu koma beinleiðis frá peningastovnunum. Tann stóra minkingin fer tó helst ikki at vísa seg fyrr enn skattaárið 1996 og framefter, t.v.s. í uppgerðini, sum verður í 1997 og framefter.
Roknað verður við, at munurin á frestandi og avlopsskatti verður kr. 25 mió. í 1996, harav landskassin skal bera umleið 60%, t.v.s. 15 mió. kr.

Lógarbroytingar.
Uppskot um telefonfrádrátt fyri langfarafiskimenn og uppskot um hækking av frádrátti hjá pensiónistum verða íkøgd fyri tingið í næstum."

1702 Rentuskattur

Sum nýggjar viðmerkingar verður innsett:

"Lógargrundarlag:
Løgtingslóg nr. 87 frá 5. juni 1992 um rentuskatt.

Renta, sum føroyskir peningastovnar og postgiro geva av innistandandi peningi, og sum likamligir persónar og deyðsbúgv undir skattskyldu eftir § 1 í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt hava rætt til.

Somuleiðis hava Føroya Lívstrygging, Tryggingarsambandið Føroyar og allar deildir tess, Íleggingargrunnurin fyri Føroyar, Menningargrunnur Ídnaðarins, Føroya Ídnaðargrunnur og Færøernes Realkreditinstitut skyldu at gjalda rentuskatt av rentu, vunnin í føroyskum eins og útlendskum peningastovnum og av inntøku, ið útlendsk virðisbrøv kasta av sær.

Budgetsundurgreining

tús. kr.	1992	1993	1994	B 1995	F 1996
Inntøkujáttan	44.292	79.231	41.610	55.000	46.000

Framrokning.
Fyrra hálvár 1995 gav eina inntøku upp á umleið kr. 32 mió. Fyri fíggjarárið 1995 verður roknað við eini inntøku upp á góðar kr. 60 mió.

Uttan lógarbroytingar verður mett, at inntøkan í 1996 verður á leið tann sama.

Orsakað av, at Tryggingarsamtakið og Lívstrygging frá 1. januar 1996 kentur undir vanliga skattskyldu fyri feløg, fer hetta at føra til eina tækking í rentuskattinum upp á kr. 15 mió. í 1996.

Roknað verður við, at rentuskatturin gevur eina inntøku upp á kr. 46 mió. í 1996."

Avgjøld og tollur (óbeinleiðis skattir)

2022 Meirvirðisgjald

Meirvirðisgjald verður kravt sambært løgtingslógur. 136 frá 8. september 1992 við seinni broytingum.

Avgjald skal rindast til landskassan í øllum liðum av vinnuligari sølu av vørum og tænastum og við innflutningi úr útlondum.

Budgettsundurgreining

tús. kr.	1992	1993	1994	B 1995	F 1996
Inntøkujáttan	44.292	79.231	41.610	55.000	46.000

Framrokning.
Fyrra hálvár 1995 gav eina inntøku upp á umleið kr. 32 mió. Fyri fíggjarárið 1995 verður roknað við eini inntøku upp á góðar kr. 60 mió.

Uttan lógarbroytingar verður mett, at inntøkan í 1996 verður á leið tann sama.

Orsakað av, at Tryggingarsamtakið og Lívstrygging frá 1. januar 1996 kemur undir vanliga skattskyldu fyri felløg, fer hetta at føra til eina lækking í rentuskattinum upp á kr. 15 mió. í 1996.

Rokna ´verður við, at rentuskatturingevur eina inntøku upp á kr. 46 mió. í 1996."

Avgjøld og tollur (beinleiðis skattir)

2022 Meirvirðisgjald

Meirvirðisgjald verður kravt sambæt løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 viðseinni broytingum.

Avgjald skal rindast til landskassan í øllum liðum av vinnuligari sølu av vørum og tænastum og við innflutning úr útlondum.

Budgetsundurgreining

tús. kr.	1992	1993	1994	B 1995	F 1996
Inntøkujáttan	0	453.540	456.110	510.000	555.000

Framrokning
Innflutningsmeirvirðisgjaldið hevur givið landskassanum eina inntøku upp á kr. 396 mió., 11 teir fyrstu mánaðirnar av 1995. Gevur december tað sama sum í ljør, verður samlaða inntøkan í 1995 kr. 430 mió. Uttan lógarbroytingar verður roknað við á leið sonu inntøku í 1996.

Skattalækkingin gevur væntandi einaøkta nýtslu í 1996.Út frá hesum kann roknast við einari øktari meir virðisgjaldsinntøku upp á kr. 25 mió.

Søluneirvirðisgjaldið gevur væntandi kr. 100 mió. í 1995. Roknað verður við sonu upphædd í 1996.

Roknaðverður við einari samlaðari meirvirðisgjaldsinntøku í 1996 upp á kr.555 mió.

2713 Skrásetingargjald

Sum nýggj budgettsundurgreining verður innsett:

"Budgettsundurgreining

tús. kr.	1992	1993	1994	B 1995	F 1996
Inntøkujáttan	32.236	6.726	7.564	10.000	30.000
Inntøkur					**30.000**
Løntr					28.000
Annað					1.500
Annað					500

Fíggjarnevndarminnilotin

Umboð Fólkaflokksins (Anfinn Kallsberg) hevur hesar viðmerkingar:

Kappingin úti í heimi er beinhørð, ikki minst innan fiskivinnu. Tí er tað ein fyritreyt hjá okkum, sum lívi av fiski, at hava eitt kappingarfør, sum er javnbjóðis við grannalondini, vit kappast við, t.d. Ísland og Skotland.

Fólkaflokkurin hevur síðan 1989 vístá, hvussu neyðugt tað er at bøta um føroyska kappingarførið, og eru tað fleiri og fleiri, ið hava ásannað hetta. Tí hava undanfarnar og místtandi samgonga framt nógv tiltøk fyri at bøta um kappingarførið, men tíverri altíð við studningi úr landskassanum, í staðin fyri at loysa veruliga trupulleikan, nevniliga at lækka kostnaðarstøðið.

Kostnaðarstøðið fyri fiskiskip er ov høgt, og tí verður latin fløgustuðul. At framleiða úr frystum fiski eru vit ikki kappingarfør, tí verður latin kilostuðul. At byggja bús er ov dýrt, og tí verður latin rentufrádráttur. Umvæling av húsum og bilum er ov kostnaðarmikil, tí letur landskassin frádrátt í skattinum til hesi endamál. At byrja nýggja vinnu er ov kostnaðarmikið, tí fáa allar nýggjar vinnur 30% aftur av lønunum.

Í skipasmíði til útlandið eru vit ikki kappingarfør, tí verður endurrindað 30% av lønunum umframt annan stuðul, ej til vinnulívið fær stuðul, vit hava FAS-skipan til farmavinnu, smoltstuðul til alivinnuna, kongafiskur úr Irmingarhavinum fær eisini stuðul. Fyri at føroyingar kunnu klára seg í kappingini um Danida projektir, skal nú latast skattafyrimunur til føroyingar, ið gera arbeiði fyri Danida, og soleiðis kundi ein hildið fram við stuðulsháttum, sum eru til, tí politikarar úr øllum flokkum hava staðfest, at vit mugu bøta um kappingarførið og harvið kostnaðarstøðið í samfelagnum. Men tíverri, enn er ikki viljt til at loysa trupulleikan undir einum.

Framvegis eru neyðlíðandi vinnur, sum ikki sleppa undir hesum slagi av kostnaðarstøðislækking. Ein stórur partur av hesum hevur fyri neyðini eina lækking, um tey arbeiðsplássini ikki eisini skulu fara fyri bakka.

Fólkaflokkurin hevur í tveimum teimum seinastu fíggjarlógunum lagt fyri tingið nágreiniligt uppskot um, hvussu vit fáa lækkað kostnaðarstøðið. Tíverri vórðu bæði uppskotini feld.

Undir fíggjarlógarviðgerðini hesa ferð er komið fram, at flokkarnir enn ikki eru til reiðar at lækka kostnaðarstøðið, so vinnulívið verður kappingarført og harvið gera tað møguligt at avtala alla tu kunstigu kostnaðarstøðislækkingina, nevniliga avtaka allar studningar.

Hóast vit nú hava ein hóp av stuðulsháttum, so er fíggjarlógaruppskot landsstýrisins sami sosialistiska gongd sum tey undanfarnu, nevniliga at flyta játtanir frá vinnulívi til almenna nýtslu, ikki nóg mikið við tí. Almenna nýtslan er vaksin nógv meir, enn vinnulívið er skorið niður, uttan at bond verður rætt frá síðu til at gera tær grundleggjandi broytingarnar, sum eru neyðugar fyri eitt vinnulív uttan almennan studning.

Sambært lógini um fløgustuðul til festfiskaflotan detta nokur skip út í mars mánaði, meiri nágreiniligt er talan um 11 stállínuskip og 23 partrolarar. Eisini hevur landsstýrið skotið upp at skera fløgustuðulin til smolt frá 25 mió. niður í 10 mió. kr. Grundin var, at arbeiðið at lækka kostnaðarstøðið var byrjað, og mettvarð tá, at komið var á mál við ársskiftið 1995, og tá føroyska vinnulívið varð kappingarført, kundi allur studningur avtakast.

Men hvat hendi. Fólkaflokkurin varð skiftur út við Tjóðveldis- og Sjálvstýrisflokkin stutt eftir ogarbeiðið at lækka kostnaðarstøðið steðgaði. Eftir løgtingsvalið 1994 undirskrivaðu Fólkaflokkurin, Sambandsflokkurin, Kristiligi Fólkaflokkurin og Miðflokkurin eitt samgonguskjal, har hetta arbeiðið skuldi bakka fram. Men tíverri, Sambandsflokkurin tordi ikki og vildi heldur fram við verandi sosialistisku oyðimarkargongd stuðlaður av tjóðveldisflokkinum.

Fyritreytirnar fyri, at 11 stállínuskip og 23 partrolarar kundu vera íløgustuðulin fyri uttan komandi ár, eru ikki tilstaðar. Hetta hevur landsstýrið ikki fagt nakað í og hevur tí strikað hendu partin av festfiskaflotanum í fíggjarlógaruppskotinum fyri 1996. Fíggjarnevndin hevur fingið at vita frá reiðarafelagnum, at um hesi skip verða strikað á fíggjarlógini, hava tey ongan møguleika at klára seg, arbeiðsplássini eru í vanda.

Prísirnir á alifiski eru nógv lækkaðir í heyst, og verður íløgustuðulintilsmoli samstundis skorin úr 25 mió. kr. niður í 10 mió. kr. næsta ár, verður neyvan nakað smolt sett út komandi ár, hevur fíggjarnevndin fingið at vita frá alivinnuni, t.v.s. arbeiðsplássini í vanda.

Arbeiðspláss, ið eru í vanda:

Við avloysarum og avleiddum arbeiðsplássum:

11 stállínuskip:	260 ársverk
23 partrolarar:	293 ársverk

Omanfyrinevndu fiska 19.200 tons:

Flakavinna	358 ársverk
Alivinna 12.000 tons	547 ársverk

við avleiddum men uttan royking o.s.fr.

Arbeiðspláss í vanda falt:	1.458 ársverk.

(Tølini eru frá vinnuni sjálvari)

So nógv arbeiðspláss kann landsstýrið ikki bert lata fara uttan nakað, her má nakað gerast. Um samgongan enn ikki er til reiðar at lækka kostnaðarstøðið, má samgongan gera okkurt annað.

Fyrbils fíggjarlóg
Ein og hvørfíggjarlóg má byggja á ta undanfarnu.Longu fyrst í november kunngjørdi landsstýrið í fjøhniðlunum, at fíggjarlógarhallið fyri 1995 ikki bleiv 210 mió. kr. sum frammanundan mett, men at hallið kom at liggja um 85 mió. kr.
Hóast fíggjarnevndin fleirt ferðir hevur biðið landsstýrið koma við tølunum, sum vísa, hvussu fram er komið til hetta minna hall, komu tølini ikki fram fyrr enn 7. december, nevniliga í eykafíggjarlógini.

Ásannandi stuttu tíð røttu tølini hava ligið á borðinum, og at semja er gjørd um 32 mió. kr. í bygnaðarspariningunum sum treyt fyri semjuni umskattalættan, har enn eingin veit, hvussu hesar 32 mió. kr. skulu sparast, mæla umboð fólkafloksins til, at løgtingið samtykkir eina fyrbils játtanarlóg, har verandi fíggjarlóg verður framlongd fram til 31. mars 1996. So hava lógting og landsstýri tíð at gera eina grundiga fíggjarlóg við útgangsstøði í játtan fyri 1995, tillagað við teimum bygnaðarbroytingum, sum semja um skattalættan byggir á.

Í hesum tíðarskeiði mælir fólkaflokkurin til, at gjørd verður ein fíggjarlóg fyri 1996, har eykafíggjarlógin fyri 1995 verður nýtt sum grundarlag. Tað vil siga, at eingin játtan verður lækkað, men heldur eingin játtan sleppur at hækka. Eingin vil gjalda meir, og tí kunnu vit ikki játta meir: reinur logikkur.

Eykafíggjarlógin, sum var framløgd 7. december 1995, vísir eitt hall upp á 87,3 mió. kr. Sambært landsstýrinum eru fleiri útreiðslur í 1995, serliga ilørur, sum antin ganga út ella minka í 1996, og eisini eru inntøkur í 1996, sum ikki eru í 1995. Taka vit útgangsstøði í eykafíggjarlógini 1995 og seta upp eina fíggjarlóg fyri 1996, sær uppsetingin av broytingunum solciðis út: (tøl frá landsstýrinum og meirlutanum í fíggjarnevndini)

Skattur frá Føroya Banka		35,0 mió.
Skrásetingargjald hækka við		5,0 mió.
	Ialt	40,0 mió.

Lægri játtan til fløgur í 96 enn í 95:		
Fíggjarstýring		1,7 mió.
Føroya Forminnissavn		1,3 mió.
Listaskáli Føroya		1,2 mió.
Kirkjur v.m.		2,0 mió.
Fiskaaling Skopun		5,2 mió.
	Ialt	11,4 mió.

Minnisturðul til vinnulív:		
Íløgustuðul til skip		13,0 mió.
Íløgustuðul til alivinnu		15,0 mió.
Stuðul til jarðarbrúk		3,6 mió.
	Ialt	31,6 mió.

Minni stuðul til alm. stovnar:		
Strandferðslan		10,0 mió.
Postverk Føroya		2,0 mió.
	Ialt	12,0 mió.

Haraftrat kemur:		
Minni veðhaldsútlegg		15,0 mió.
Minni fløgur til vegir, havnir og lendingar		20,0 mió.
Arbeiðsloysisskipanin		50,0 mió.
	Ialt	85,0 mió.

Betran av fíggjarúrsliti falt	180,0 mió.
Hækkan av rentuútreiðslum	-36,8 mió.
Hall á fíggjarlógini 1995	-87,7 mió.

Avlop á fíggjarlógini bert við at framskriva	56,3 mió.
Haraftrat koma so avtalaðu bygnaðarbroytingar	32,0 mió.

Tøkt til lætta við J A V N V Á G á fíggjarlógini	88,3 mió.

Í sambund við skattalættan, sum samgongan avtaloði 7/12. sigur landsstýrið, at ein fylgja av skattalættanum upp á 87,5 mió. kr. er, at skattur og avgjøld kunnu hækkast við 30 mió.

Meirlutin í fíggjarnevndini metir hesa hækking at fara at verða 40 mió. kr., tvs. at 46% av skattalættanum koma aftur í landskassan sum hægri skattur og avgjøld.

Møguleikarnir fyri skattalætta út frá frammanfyri standandi framskriving gerast nú betur, um løgtingið samtykkir uppskot okkara. Vit fáa í fyrsta lagi rúm fyri 88,3 mió. kr. í skattalætta. Haraftrat kemur multiplikatoreffektin av skattalættanum, sum sambæri meirlutanum í fíggjarnevndini verður 46% ella tað sama sum 74,5 mió.

Saman við omanfyri nevndu 88,3 mió. kr. gevur hetta 162,8 mió. kr. og javnvág á fíggjarlógini fyri 1996.

Hesar 162,8 mió. kr. kunnu nýtast til at lætta um hjá fólki. Ein møguleiki er at nýta alt til skattalætta, meðan aðrar byrðar hjá fólki, so sum fíggjarognaravgjald, oljugjald og MVG á ravmagn og tænastum kunnu eisini lækkast kombineraðið við einum skattalætta. So kann lættin metast eftir hvørjum politisk semja fæst fyri.

Fyri rættiliga at fáa samfelagið aftur á rætkjøl skal tað loysa seg at arbeiða, loysa seg at tjena meir, at spara saman og at gera íløgur. Hetta er fyritreyt fyri at gera privat, vinnuligt og alment lønsemi møguligt.

Umboð fólkafloksins (Anfinn Kallsberg) fer tí staðiliga at heita á løgtingið um at samtykkja uppskotið um eina provisoriska fíggjarlóg fyri fyrsta ársfjórðing 1996.

Út frá hesum verður sett fram soljóðandi broytingaruppskot til uppskot landsstýrisins:

Broytingaruppskot II

Broytingaruppskot til løgtingsmál nr. 9/95: Løgtingsfíggjarlóg 1996.

§ 1. Til fíggjarlógina fyri fíggjarárið 1996 er samtykt, verður landsstýrinum heimilað at uppkrevja skattir og gjøld eftir galdandi lógum. Landsstýrinum verður heimilað í sama tíðarskeiði at rinda neyðugar útreiðslur soleiðis, at landshúsarhaldið ótarnað kann fara fram, og átiknar skyldur verða bildnar.

§ 1. Stk. 2. §§ 4, 5, 6, 7, 8, 9, 10, 11, 13, 14, 15, 16, 17, 18, 19, 30, 35, 38, 40, 42 og 45 verða strikaðar.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1996 og fer úr gildi 31. mars 1996.

Skuldi tað óvæntaða hent, at uppskotið verður felt, fer minnilutin vísandi til viðmerkingarnar um alivinnu og feskfiskaflotan at seta fram soljóðandi broytingaruppskot til uppskot landsstýrisins.

Broytingaruppskot III

Broytingaruppskot til løgtingsmál nr. 9/1995: Løgtingsfíggjarlóg 1996.

§ 13 Fiski-, ali- og sjóvinna

A. Yvirlit

Játtanaryvirlit

kr.	Nettotal	Útreiðslur	Inntøkur
Útreiðslujáttan	25.300	25.300	

Vinnuframi ..... **25.300** -

B. Játtanir

			Útreiðslur	Inntøkur
Vinnuframi				
16417	Íløgustuðul (Lógarbundin játtan)	F	55.000	-
	Hjá fíggjarnevndarminnilutanum	**BU**	**10.300**	-
	Játtanin verður hækkað við kr. 10,3 mió.			

16907/ 333407	Tiltøk fyri alivinnuna	F	19.300	-
	Hjá fíggjarnevndarminnilutanum	**BU**	**15.000**	-
	Játtanin verður hækkað við kr. 15 mió.			

Viðmerkingar til broytingaruppskot

Vinnuframi

16417 Íløgustuðul (Lógarbundin játtan)
Sum nýtt reglubrot verður innsett:

"Játtan fyri tey skip, sum fara úr skipanini 5. mars 1996 verður at gjalda eisini eftir 6. mars 1996 við eini upphædd, ið svarar til 75% av núgaldandi upphædd."

Sum nýggj budgettsundurgreining verður innsett:

Budgettsundurgreining

Túsund kr.	1992	1993	1994	B 1995	F 1996
Útreiðslujáttan				60.000	65.300
Útreiðslur				60.000	65.300

16907/333407 Tiltøk fyri alivinnuna

Í fyrsta reglubroti verður "Íløgustuðul ... 10 mió. kr." broytt til: "Íløgustuðul .... 25 mió. kr."

Sum nýggj budgettsundurgreining verður innsett:

"Budgettsundurgreining

Túsund kr.	1992	1993	1994	B 1995	F 1996
Útreiðslujáttan		20.263	25.000	25.000	34.300
Útreiðslur		20.263	25.000	25.000	34.300

(Er tikið aftur, í staðin er broytingaruppskot lagt fram í veinum.)

21. december 1995 legði Anfinn Kallsberg, løgtingsmaður, til 2. viðgerð frem

B r o y t i n g a r u p p s k o t

§ 16 Samferðsla og samskifti

13018 Nýgerð av landsvegum (Íløgujáttan)
Hjá Anfinn Kallsberg

Virksemisyvirlit

Vegagerð í Kalsoy

Viðmerking

Játtanin verður at nýta til vegagerð Húsar - Syðradal.
(Samtykt við 14-6-12 atkvøðum.)

21. december legði Jenis av Rana, løgtingsmaður, til 2. viðgerð

B r o y t i n g a r u p p s k o t

§ 8 Heilsumál

Aðrir viðgerðarstovnar

12912	Viðgerð av rúsevnismisnýtslu (Rakstrarjáttan)	F	8.000
	Hjá Jenis av Rana	**BU**	**-3.600**
	Partur av játtanin flutt til annað rakstrarstað		
	Blákrossheimið (Rakstrarjáttan)	F	4.400
	Hjá Jenis av Rana (nýtt rakstrarstað)		
	Upphæddin lutvist flutt frá 12912 og lutvist hækkað játtan.		

Viðmerkingar til broytingaruppskotið

12912 Viðgerð av rúsevnismisnýtslu *(Rakstrarjáttan)*

Játtanin er ætlað Heilbrigðið til viðgerð av rúsevnismisnýtarum.

Budgettsmuldurgreining

	1993	1994	B 1995	F 1996
Útreiðslujáttan			4.400	4.400

Blákrossheimið *(Rekstrarjáttan)*

Í upprunauppskoti og umsókn viðgerðarstovnsins var søkt um kr. 4.4 mió.
Landsstýrið lækkaði hetta til kr. 4 mió, fíggjarnevndin gekk ikki ábeitan stovnsins á móti, (viðmerkjast skal her at fíggjarnevndin hinvegin hækkaði játtanina til hin viðgerðarstovnin (Heilbrigðið) við kr. 400.000,-) og fer hetta at fáa fylgir fyri viðgerðarmøguleikarnar.

Sum viðmerkingar og budgettsundurgreining verður innsett:

Játtanin er ætlað Blákrossheimið til viðgerð av rúsevnismisnýtarum.

Budgettsundurgreining

	1993	1994	B 1995	F 1996
Útreiðslujáttan			4.000	4.400

(Fall við 7-6-19 atkvøðum.)

21. december 1995 legði Aufinn Kallsberg, løgtingsmaður, til 2. viðgerð fram soljóðandi

broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

BROYTINGARUPPSKOT IV

§ 13 Fiski-, Alí- og Sjóvinna

			Útreiðslur	Inntøkur
Vinnuframi				
16417	Íløgustuðul (Lógarbundin játtan)	F	55.000	-
		BU	**10.300**	-

Játtaðar verða hækkað við kr. 10,3 mió.

Viðmerking til broytingaruppskotið

16417 Íløgustuðul (Lógarbundin játtan)
Sum nýt reglubrot verður innsett:

"Játtan fyri tey skip, sum fara úr skipanini 5. mars 1996 verður at gjalda eisini eftir 6. mars 1996 við eini upphædd, ið svarar til 75% av núgaldandi upphædd."

Sum nýggj budgettsundurgreining verður innsett:

"Budgettsundurgreining

tús. kr.	1992	1993	1994	B 1995	F 1996
Útreiðslujáttan				60.000	65.300
Útreiðslur				**60.000**	**65.300**

(Fall við 9-6-17 atkvøðum.)

BROYTINGARUPPSKOT V

§ 13 Fiskl-, ali- og sjóvinna

		Útreiðslur	Inntøkur
16907: Tiltøk fyri alivinnuna 333407	F	19.300	-
	BU	15.000	

Játtaðar verða brækkað við kr. 15 mió.

Viðmerking til broytingaruppskotið

16907/333407 Tiltøk fyri alivinnuna

Í fyrsta reglubroti verður "Íløgustuðul ... 10 mió. kr." broytt til: "Íløgustuðul .... 25 mió. kr."

Sum nýggj budgettsundurgreining verður innsett:

"Budgettsundurgreining

tús. kr. 1992	1993	1994	B1995	F 1996
Útreiðslujáttun	20.263	25.000	25.000	34.300
Útreiðslur	20.263	25.000	25.000	34.300

Broytingaruppskot III í álitinum frá fíggjarnevndini verður tikið aftur.

(Fall við 8-7-17 atkvøðum).

2. viðgerð 21. december: Broytingaruppskot II frá minniluttanum (Anfinn Kallsberg) um fyribils fíggjarlóg fall við 6-2-22 atkvøðum. Broytingaruppskot IV frá sama minniluta til § 13 um íløgustuðul fall við 9-6-17 atkvøðum. Broytingaruppskot frá sama minniluta til § 13 um tiltøk fyri alivinnuna fall við 8-7-17 atkvøðum. Broytingaruppskot frá sama minniluta til § 16: Nýgerð av landsvegum samykt við 14-6-12 atkvøðum. Broytingaruppskot frá minniluttanum (Jenis av Rana) fall við 7-6-19 atkvøðum. Broytingaruppskot meirilutans samykt við 24-1-7 atkvøðum. Uppskot landsstýrisins soleiðis broytt samykt við 25-0-7 atkvøðum. Samykt við 25-7-0 atkvøðum at heina málið til 3. viðgerð.

22. december 1995 løgdu tingmennindr Vilhelm Johannesen, Anfinn Kallsberg, Kristian Magnussen, Ávur Zachariasen, Finnbogi Ísakson, Tórður J. Niclasen og Finnbogi Arge til 3. viðgerð fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

Grein 8 Heilsumál

Rakstrarstað 12109 Landssjúkrahúsið
verður brækkað við kr. 2.000.000 og sett til kr. 218.952.000

<u>Viðmerking</u>

Fíggjarnevndin mælti í álitinum til eykafíggjarløgtingslóg 1995 flyta kr. 2 mió. frá eykafíggjarløgtingslógini 1995 til løgtingsfíggjarlógina 1996. Landsstýrismaðurin í heilsumálum bevur heitt á nevndina um at fáa hetta broytt soleiðis, at rakstrartølini fyri árið 1995 vera óbroytt og upprunaliga fíggjarlógaruppskotið fyri 1996 verður óbroytt.

22. december 1995 løgdu tingfólkini Ingeborg Vinter, Lasse Klein, Jenis av Rana og Jákup Olsen til 3. viðgerð fram soljóðandi

Broytingaruppskot

§ 8 Heilsumál

12912 Viðgerð av rúsevnismisnýtslu
verður hækkað við kr. 300.000

Budgettsundurgreining
Blákrossheimið verður broytt til kr. 4.300.000

Viðmerking:

Í Føroyum eru í løtuni tveir skrásettir viðgerðarstovnar fyri rúsdrekka- og rúsevnismisnýtarar - Heilbrigdið og Blákrossheimið. Í uppskoti landsstýrisins til løgtingsfíggjarlóg fyri 1996 setti landsstýrið av kr. 4 mió. til hvønn stovnin. Hetta var kr. 400.000 lægri enn, hvor stovnurin hevði søkt um, men í fíggjarnevndini var samtykt eftir áheitan stovnsins at hækka játtanina til Heilbrigdið við kr. 400.000, meðan sama umsókn frá Blákrossheiminum uttan grundgeving ikki var gingin á møti.

Við 2. viðgerð feldi løgtingið uppskot um at játta Blákrossheiminum somu hækkan, sum varð játtað hinum viðgerðarstovninum, tí verður fyri at tryggja grundarlagið undir stovninum uppskot sett fram um at hækka játtanina til Blákrossheimið við kr. 300.000.

22. december 1996 løgdu tingmenninir Anfinn Kallsberg, Óli Breckmann, Jógvan á Lakjuni, John Petersen, Jørgen Niclasen og Bjarni Djurholm til 3. viðgerð fram soljóðandi

Broytingaruppskot

§ 13 Fiski-, ali- og sjóvinna

		Útreiðslur	Inntøkur
Vinnuframi			
16417 Íløgustuðul (lógarbundin játtan)	F	55.000	-
	BU	6.900	

Játtanin verður hækkað við kr. 6,9 mió.

Viðmerking til broytingaruppskotið:
16417 Íløgustuðul (lógarbundin játtan)
Sum nýtt reglubrot verður innsett:

"Játtan fyri tey skip, sum fara úr skipanini 5. mars 1996 verður at gjalda eisini eftir 6. mars 1996 við eini upphædd, ið svarar til 50% av núgaldandi upphædd."

Sum nýggj budgettsundurgreining verður innsett:

"Budgettsundurgreining

tús. kr.	1992	1993	1994	B 1995	F 1996
Útreiðslujáttan				60.000	61.900
Útreiðslur				60.000	61.900

§ 13 Fiski-, ali- og sjóvinna

		Útreiðslur	Inntøkur
16907/ Tiltøk fyri alivinnuna	F	19.300	-
	BU	10.000	

333407 Játtanin verður hækkað við kr. 10 mió.
Viðmerking til broytingaruppskotið:

16907/333407 **Tiltøk** fyri alivinnuna

Í fyrsta reglubroti verður "Íløgustuðul ... 10 mió. kr." broytt til: "Íløgustuðul .... 20 mió. kr."

Sum nýggj budgettsundurgreining verður innsett:

"Budgettsundurgreining

tús. kr.	1992	1993	1994	B 1995	F1996
Útreiðslujáttan		20.263	25.000	25.000	29.300
Útreiðslur		20.263	25.000	25.000	29.300

(Fall við 9-4-18)

3. viðgerð 22. december 1995. Broytingaruppskotið frá Jenis av Rana v.fl. fall við 8-9-14. Broytingaruppskotið frá Anfinn Kallsberg v.fl. fall við 9-4-18 atkvøðum. Lógin sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 24-7-0 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 177, 22. december 1995.

10 Løgtingslóg um borgan fyri kommunulánum og um umlegging av kommunulánum

Ár 1995, leygardagin 30. september legði Ivan Johannesen, landsstýrismaður, vegna Eilif Samuelsen, landsstýrismann, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um borgan fyri kommunulánum og um umlegging av kommunulánum.

§ 1. Lógin umfatar lán úr landskassanum, og lán til kommunur ella kommunalar felagsskapir, sum landskassin borgar fyri mótvegis danska statinum. Kommunukredit ella øðrum lánsveitara, tá henda lóg fær gildi.

§ 2. Í sambandi við samlaðu endurfíggingina av kommunuskuldini fær landsstýrið fylgjandi heimildir:

1. Landsstýrið kann sum borgsmaður góðkenna broytingar í lánstreytunum, heruppií at lánini verða yvirtikin av øðrum lánsveitara, at avdráttartíðin verður longd t.d. uppí 30-ár (30-ára annuitetslán), v.m.
2. Útlegg úr landskassanum fyri landskassaborgan og lán úr landskassanum til kommunur og kommunalar felagsskapir kunnu verða umløgd til lán úr landskassanum sambært avtaluni um endurfígging av kommunuskuldini.
3. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veita trygd fyri rentutapi av lánum, sum stendst av, at tann millum lánveitara og lántakara avtalaða hámarksrenta, er lægri enn marknaðarrentan treytar. Útlegg úr landskassanum vegna trygd fyri rentutapi kann ikki gerast galdandi móti kommunum ella kommunalum felagsskapi.

§ 3. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar.
Endalig avtala um endurfígging av kommunuskuldini er send kreditorunum. Landsstýrið skal, umframt sum eftirlitsmyndugleiki, luttaka í avtaluni sum borgsmaður, og sum lánveitari til kommunur og kommunalar felagsskapir.

Í hesum sambandi er neyðugt, at landsstýrið fær heimild til at góðkenna broytingar í lánitreytum, at góðkenna at landkassaútlegg fyri borgan ikki verða kravd innaftur beinanvegin, men umløgd sambært endurfíggingaravtaluni, eins og at lán úr landskassanum verða umløgd sambært avtaluni. Herumframt verður skotið upp, at landsstýrið fær heimild til at veita trygd fyri rentutapi, uttan regresrætt fyri møguligum landskassaútleggi.

Ad § 2, nr. 1.
Eftir uppskotinum kann landsstýrið góðkenna, at givnar landskassaborganir framhaldandi hava gildi hóast at lánitreytirnar verða broyttar, t.d. at avdráttartíðin verður longd uppí 30 ár, ella at lán verða yvirtikin av øðrum lánveitara.

Av tí at heimildirnar fyri givnum landskassaborganum finnast í fleiri løgtingslógum, og tá tað kann verða ein tulkingarspurningur um verandi heimildir røkka, hevur landsstýrið men, at rættast er at útvega nýggja og staðiliga heimild, at góðkenna umleggingar av lánunum. Hetta hevur ongar beinleiðis avleiðingar fyri gjaldføri landskassans.

Ad § 2, nr. 2. Umlegging av landskassaútleggum til lán.
Skotið er upp, at landsstýrið fær heimild at góðkenna at landskassaborganir, sum verða effektivar, bert verða gjørdar galdandi móti kommununum sambært avtaluni um endurfígging av kommunuskuldini, t.v.s. í praksis, at landskassaútlegg verða umløgd til 5- ára avdráttarfri lán til rentu 9% p.a.

Eftir endurfíggingaravtaluni eru gjaldingarnar av lánsgjøldum tryggjaði soleiðis, at tað er lítið sannlíkt, at borgarir gerast effektivar í avtalutíðini.

Men lánsveitarnir hjá Vágs kommunu (Skandinaviska Enskilda Banken) og IRF (hollendskur banki) luttaka ikki í endurfíggingaravtaluni, tá borgan er veitt fyri lánunum.

Fyri lániunum hjá Vágs kommunu uppá 8,5 mió. kr borgar Føroya Banki, og landsstýrið hevur veitt móti borgan. Enn er ikki avklárað, um landsstýrið sum móthorgsmaður, ella Føroya Banki skal fara inn í endurfíggingaravtaluna í lánveitarans stað. Møguliga verður tað so, at Føroya Banki fer inn í avtaluna og fær tað undir nr. 3 nevndu trygd frá landsstýrinum.

Skal ikki øll endurfíggingaraetlanin koma í vandu, er neyðugt at landsstýrið yvirtekur lánið hjá IRF ella rindar restskuldina tá hon fellur í oktober 1995, og umleggur útleggið sambæt endurfíggingaravtaluni.

Avleiðingar fyri landskassan.
Restskuldin av lániinum hjá IRF er uml. 8 mió. kr. IRF rindar sjálvt 4 mió. kr. 5. oktober í ár, sostatt eru 4 mió. kr. eftir. Verður lánið yvirtikið, ella rindað av landsstýrinum við forfall 5. oktober 1996, merkir hetta, at landskassaútleggið í 1996 verður uml. 4 mió. kr., umfram rentur 13 1/8% p.a. Men landsstýrið kann eftir avtaluni krevja, tá lagt verður út, at IRF rindar 9% p.a. av renturnum, fyri ta tá farna termin, og at lánið síðani verður umlagt til lán úr landskassanum, avdráttarfrítt í 5 ár til rentu 9% p.a. Netto tyngir hetta landskassans gjaldføri í 1996 við uml. 4 mió. kr.

Að § 2. nr. 2. Umlegging av verandi lánum úr landskassanum til kommununar.
Landsstýrið fær eftir uppskotinum eisini heimild at umleggja verandi lán úr landskassanum til kommunur og kommunalar felagssakpir tilsamans uml. 15,8 mió. kr. umfram eitt landskassaútlegg fyri IRF uppá 69,7 mió. kr., sum serlig afturgjaldsskipan er gjørd fyri.

Lánini kunna eftir avtaluni verða umløgt til variabla rentu max. 10% p.a. við møguleika fyri ávisum avdráttum, um rentan er lægri enn 10%, ella til fasta rentu max. 9% p.a. uttan avdráttir. Rentan av lánum, sum eftir galdandi avtalum hava lægri rentu enn tann í avtaluni ásetta hámarksrentan, skulu í avtalutíðini framhaldandi verða rentað við lægru rentuni.

Lánini úr landskassanum hava øll lægri rentu enn hámarksrentan í avtaluni. Her verður tí eingin broyting.

Tá lánini úr landskassanum áðrenn og eftir umleggingina hava fasta rentu, verða eingir avdráttir rindaðir í avtalutíðini, sum ávirkar gjaldføri landskassans, sum niðanfyri nevnt.

Avleiðingar fyri landskassan.

Lánini úr landskassanum eru:

Kommunali lánigrammurin:
Restskuld 9,4 mió. kr., renta 7,25% p.a. árl. avdr. kr. 851.000.

Lán til heilsumiðstøðir:
Restskuld 5,4 mió. kr., renta 2% p. a., árl. avdr. kr. 698.000.

Lán til fróttaanlegg:
Restskuld. 1 mió. kr., renta 8% p.a., árl. avdr. kr. 200.000

At lánini verða umløgd til avdráttarfrí lán, tyngir sostatt gjaldføri landskassans við 1,7 mió. kr.

Afturgjaldsavtalan um landskassaútleggið fyri IRF er tillagað rakstraraetlanunum hjá IRF, og roknað verður ikki við, at endurfíggingaravtalan fær ávirkan á gjørda afturgjaldsskipanina.

Ad. § 2. nr. 3. Landskassatrygd fyri rentutapi.

A. Eftir uppskotinum kann landsstýrið veita lánveitanum við landskassaborgan, sum ikki verða innloystir av landsstýrinum, trygd fyri møguligum rentutapi, hesir hava av, at tann í avtaluni ásetta hámarksrentan, er lægri enn marknaðarrentan treytar.

Kommunukredit hevur góðkent at luttaka í avtaluni um endurfíggingina av kommunuskuldini. Men Kommunukredit hevur treytað sær, at landsstýrið sum borgsmaður, veitir trygd fyri rentutapi, sum Kommunukredit kann fáa av, at tann í endurfíggingaravtalumi ásetta hámarksrenta, ávikavist 9% fyri fast forrentaði lán og 10% fyri lán við variablari rentu, verður lægri enn rentan, sum Kommunukredit kann útvega á marknaðinum. Sambært endurfíggingaravtaluni kann landsstýrið ikki krevja kommunurnar eftir møguligum útleggi.

Eftir teimum løgtingslógum, sum verandi borganir eru veittar eftir, er ikki heimild til at landsstýrið veitir trygd fyri lánsgjøldum, sum lántakarin ikki sjálvur heftir fyri. Neyðugt er tí, at landsstýrið fær nýggja heimild frá løgtinginum til at veita trygd.

Avleiðingar fyri landskassan.

Føst forrentað lán:
Sum marknaðartreytirnar eru í løtuni, kann Kommunukredit veita standandi lán yvir 5 ár (fasta rentu) til 7,25%. Bert um marknaðarrentan áðrenn lánini verða endurfíggjaði, hækkar við meira enn 1,75%, verður útlegg úr landskassanum aktuelt. Hetta verður av serkønum mett ikki at verða sannlíkt.

Lán við variablari rentu.
Vanliga útlánsrentan hjá Kommunukredit fyri variabult forrentað lán yvir 5 ár er í dag 5,65% p.a. Rentan verður fastløgt hvønn 3. mánaða. Bert um tann stutta renta í einum ársfjórðingi fer upp um 10% p.a. verður landskassatrygdin aktuel. Serkøna metingin er, at hetta ikki er serliga sannlíkt.

Annuitetslán yvir 30 ár:
Eftir endurfíggingaravtaluni kunnu lán verða umløgt til 30- ára annuitetslán. Treytin fyri hesum er, at bruttolánsgjøldini verða undir 10% av lánsupphæddini. Í hesum førinum verður landskassatrygdin tí ikki aktuel.

Verður trygdin effektiv, verður upphæddin sum leggjast skal út úr landskassanum uml. 1,9 mió. kr. fyri hvørt prosentlið, sum rentan er omanfyri ávikavist 9% p.a. og 10% p.a.

Samanumtikið kann sigast, at tapsvandin fyri landskassan av at veita tílíka trygd er sera avmarkaður.

C. Lán hjá Vágs kommunu.
Føroya Banki, sum eins og Kommunukredit hevur landskassaborgan, kann krevja sama trygd sum Kommunukredit fyri møguligum rentutapi. Heimildin hjá landsstýrinum at veita trygd fyri rentutapi kann tí ikki bert umfatað lán frá Kommunukredit.

Um tapsvandan hjá landskassanum kann sigast tað sama sum omanfyri viðvíkjandi lánum frá Kommunukredit, men soleiðis at um rentan í avtalutíðini fer uppum 10%, verður útleggið úr landskassanum uml. 80-90.000 kr. fyri hvørt prosentið rentan er hægri enn 10%.

1. viðgerð 17. oktober 1995. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 27. oktober 1995 legði fram soljóðandi

Átit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 30. september 1995 og eftir 1. viðgerð 10. oktober 1995 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjort málið og hevur hesar viðmerkingar. Í uppskoti landsstýrisins eru ongar viðmerkingar til § 1 í lógaruppskotinum, og fíggjarnevndin vil í tí sambandi vísa á § 44, stk. 3, pkt. 6, í Tingskipan Føroya Løgtings, har ásett er, at niðast skal eftir at greiða frá innhaldinum í hvørji einstakari grein í uppskotinum, har grein verður frá ætlanini í greinini og ítgreinað, hvussu greinin skal skiljast. Tí heitir fíggjarnevndin á landsstýrið í framtíðini at fylgja ásetingunum í § 44 í tingskipanini, so løgtingslimir og løgtingsnevndir fáa betri treytir at kunna seg um lógarmál, ið støða skal takast til.

Nevndin býtti seg í ein meirilutu og ein minnilutu.

Meirilutin (Finnbogi Arge, Jørgen Niclasen, Vilhelm Johannesen, Kristian Magnussen, Álvur Zachariasen og Tórður J. Niclasen) tekur undir við uppskotinum. Tórður J. Niclasen viðmerkir tó, at hann tók undir við uppskotinum ásannandi, at hetta er ein heildarloysn, ið kommununar hava góðtikið, men harmaðist samstundis um, at § 2, pkt. 3, er ein partur av loysnini.

Minnilutin (Finnbogi Ísakson) tekur undir við uppskotinum, men ikki við § 2, pkt. 3. Tað er út frá tí, at hann heldur, at tá so at siga allir aðrir lánveitarar kring um í heiminum kunnu ganga við til at umfíggja føroysku kommunuskuldina, so eigur útvegur at verða funnin fyri, at eisini Kommunekredit kann ganga við til tað uttan nakra serskipan. Um neyðugt eigur stjórnin at fáa lógina um Kommunekredit broytta ígjøgnum Fólkatingið, ella um teir skulu hava nakra betri trygd enn aðrir, so eigur statskassin at veðhalda fyri eykatrygdini og ikki landskassin.

2. viðgerð 2. november 1995. Lógin samtykt við 27-2-0 atkvøðum.

3. viðgerð 7. november 1995. Lógin endaliga samtykt við 24-2-0 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 151 frá 10. november 1995.

FL jnr. 812-52/90.

11 Happadráttarloyvi til Útvarp Føroya

Ár 1995, týsdagin 11. oktober legði Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um happadráttarloyvi til Útvarp Føroya

§ 1. Landsstýrið fer heimild at veita Útvarpi Føroya loyvi til happadráttarsølu eftir nærri ásettum treytum.

§ 2. Henda lóg fær gildi frá 1. mai 1995, og er galdandi í 5 ár.

Viðmerkingar:

Lógin um happadráttarloyvi til Útvarp Føroya nr. 71 frá 26. november 1969 við seinni broytingum lór úr gildi 30 apríl 1995.

Útvarpið hevur heitt á landsstýrið um at leggja uppskot fyri løgtingið um at endurnýggja loyvið.

Tey trý árini frá 1. januar 1992 til 31. desember 1994 var árslitið av V4 spelinum:

Bruttoinngjald		17.602.521
Vinningar	7.929.969	
Skattur	1.225.945	
Umsiting	492.648	9.648.562
Ágóði útvarpsins		7.953.959
Postgjald	1.530.654	

Hesi árini hevur árliga inntøkan av V4-spælinum sostatt verið í meðal góðar 2,6 mió. kr. Inntøkurnar frá V4-spælinum hava stóran týdning fyri raksturin hjá útvarpinum. Útvarpið hevur nú rikið V4-spælið í góð 26 ár, og hetta er verðið ein fastur partur av inntøkugrundarlagnum hjá stovninum.

Higartil hevur happadráttarloyvið verið endurnýggjað í eitt avmarkað áramál, seinastu ferðirnar trý ár í senn. Útvarpið heitir á landsstýrið um at umhugsa, at gera happadráttarloyvið til eitt standandi loyvi uttan tíðaravmarking. Í øðrum lagi verður mælt til, at loyvið verður endurnýggjað í trý ár.

Landsstýrið loyvir sær at mæla til, at endurnýggja lógina í 5 ár, tá útvarpinum framvegis tørvar nevndu inntøku til raksturin og neyðuga úbygging.

1. viðgerð 24. oktober 1995. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 22. november 1995 legði fram soljóðandi

Ákvæði

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 11. oktober 1995 og eftir 1. viðgerð 24. oktober 1995 beint í rættarnevndina.

Ein samd nevnd mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Heitt verður á landsstýrið um í fruntíðini at leggja uppskotini rættstundis fyri løgtingið.

2. viðgerð 27. november 1995. Málið samtykt við 27-0-0 atkvøðum.

3. viðgerð 1. desember 1995. Lógin endaliga samtykt við 19-0-0 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 157 frá 6. desember 1995.

F.L. j.nr. 660-8/92.

12 Broyting í lóg um tiltøk í samband við barnsburð v.m.

Ár 1995, mikudagin 22. november legði Jenis av Rana, løgtingsmaður, vegna Miðflokkin fram soljóðandi

Uppskot

til

ríkislógartilmæli

Tilmælt verður ríkismyndugleikunum at seta í gildi fyri Føroyar soljóðandi:

Lóg fyri Føroyar um broyting av lóg um tiltøk í samband við barnsburð v.m.

§ 1.

Í lóg fyri Føroyar nr. 177 frá 23.06.1956 um tiltøk í samband við barnsburð v.m., sum sett í gildi við kgl. fyriskipan nr. 228 frá 20.06.1959 og broytt við kgl. fyriskipan nr. 73 frá 14.03.1968 verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1, stk. 1, nr. 1 verður 1. pkt. orðað soleiðis:
"Tá ið neyðugt er at steðga barnsburðinum fyri at forða fyri álvarsomun vanda fyri lívi kvinnunnar."
2) § 1, stk. 1, nr. 2, 3 og 4 fara úr gildi.
3) § 1, stk. 2, 3 og 4 fara úr gildi.
4) § 2 fer úr gildi.
5) § 3, stk. 2, verður orðað soleiðis:
"Um so er, at vandin fyri lívi kvinnunnar í teim í § 1, stk. 1, nr. 1, nevndu føtrum er grundað á sjúku, og hetta er staðfest á einum av teimum í hesi grein, stk. 1, nevndu sjúkrahúsum, kann avgerð um at steðga barnsburðinum takast eftir tilmæli í sernju frá serlækna í teirri sjúkuni, kvinnan hevur, og leiðandi yvirlæknanum á teirri deild, har kvinnan verður viðgjørd."
6) § 3, stk. 3 og 4 fara úr gildi, og nýtt stk. 3 verður orðað soleiðis:
"Hendir tað seg, at ein kvinna (eina hjón) orsakað av sosialum, líkamligum, sálarligum ella øðrum grundaðum viðurskiftum, kemur í eina støðu, har hon (tey) metir seg ikki at verða føra fyri at fullføra barnsburðin ella at taka sær av nýfødninginum, kann hon (tey) venda sær til eina nevnd, sum sett er at taka sær av slíkum málum, sett við einum sálahirða, einum sosialráðgeva og einum advokati. Endamál nevndarinnar er at fáa til vega neyðugu hjálpina í slíkum málum, og henda hjálp kann verða at fáa greiðu á, hvør tørvurin er, og útvega ta neyðugu hjálpina, tað veri seg fíggjarliga, læknaliga (hernppíf psykiatriska) hjálp til burturættleiðing v.m."
7) §§ 3, 4 og 5 verða hereftir §§ 2, 3 og 4.

Det indstilles til rigsmyndighederne at ikraftsætte for Færøerne følgende:

Lov for Færøerne om ændring af lov om foranstaltninger i anledning af svangerskab m.v.

§ 1.

I lov for Færøerne nr. 177 af 23.06.1956 om foranstaltninger i anledning af svangerskab m.v., som sat i kraft ved kgl. anordning nr. 228 af 20.06.1959 og ændret ved kgl. anordning nr. 73 af 14.03.1968 foretages følgende ændringer:

1) I § 1, stk. 1, nr. 1 affattes 1. pkt. således:
"Når svangerskabets afbrydelse er nødvendig for at afværge alvorlig fare for kvindens liv."
2) § 1, stk. 1, nr. 2, 3 og 4 ophæves.
3) § 1, stk. 2, 3 og 4 ophæves.
4) § 2 ophæves.
5) § 3, stk. 2 affattes således:
"Såfremt faren for kvindens liv i de i § 1, stk. 1, nr. 1, omhandlede tilfælde er begrundet i sygdom, og det er konstateret på et af de i nærværende paragrafs stk. 1 omhandlede sygehuse, kan bestemmelse om svangerskabsafbrydelse træffes efter enig indstilling af speciallæge i den sygdom, kvinden lider af, og ledende overlæge på den afdeling, hvor kvinden modtager behandling."
6) § 3, stk. 3 og 4 udgår, og nyt stk. 3 affattes således:
"Skulle der opstå situationer, hvor en kvinde (et ægtepar) p.gra. sociale, legemlige, psykiske eller andre begrundede forhold kommer i en situation, hvor hun (de) vurderer sig ude af stand til at gennemføre en graviditet eller tage sig af det nyfødte barn, kan hun (de) rette henvendelse til et til sådanne sager oprettet nævn, bestående af en sjælesørger, en socialrådgiver og en advokat. Nævnets formål er at formidle den nødvendige bistand og hjælp i sådanne sager, og denne bistand ville kunne bestå i at klarlægge behov for og formidle nødvendig hjælp, det være sig økonomisk, lægelig (inclusiv psykiatrisk) hjælp ved bortadoption m.m."
7) §§ 3, 4 og 5 ændres til §§ 2, 3 og 4.

8) Í § 6, stk. 3, 3. punktum ganga út: "§§ 2 og 3", og ístaðin verður sett: "§ 2".
9) § 6 verður hereftir § 5.
10) §§ 7 og 8 verða hereftir §§ 6 og 7.
11) § 9 gongur út.
12) § 10, 11, 12 og 13 verða hereftir §§ 8, 9, 10 og 11.

8) I § 6, stk. 3, 3 punktum udgår: "§§ 2 og 3, ændres til: " § 2 ".
9) § 6 bliver herefter § 5.
10) §§ 7 og 8 bliver herefter §§ 6 og 7.
11) § 9 ophæves.
12) §§ 10, 11, 12 og 13 bliver herefter §§ 8, 9, 10 og 11.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, hon er kunngjørd í Kunngerðablaðnum.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens kundgørelse i Kunngerðablaðnum.

Viðmerkingar:

Tað eru tvey endamál við lógini. 1: at veita barninum rættartrygd í móðurlívi, og 2: at veita mammuni (foreldrunum), sum ikki meta seg før fyri at gjøgnumføra ein barnsburð ella uppala eitt barn, ta hjálpina, teimum tørvar.

Fyrsta endamálið, rættartrygdin til tað ófødda barnið, fæst við broytingum í núverandi lóg frá 23. juni 1956. Annað endamálið verður mett gjøgnumført við setan av 3-manna nevnd við heimild til at veita neyðuga leiðbeining og hjálp. Sum nevndarlimir verður mett hóskandi at velja ein við royndum innan sálarrøkt, ein sosialráðgeva og ein advokat. Hesi kunnu ráðgeva innan karmarnar av verandi lóggávum, so sum almanna- og adoptiónslóggávuni, kunnu søkja sær neyðuga hjálp frá møguligum serkunnleika (t.d. læknaligum), og um neyðugt gera tilmæli til broytingar í verandi lóggávum, um tað verður mett neyðugt fyri at kunna uppfylla endamálið við hesari lóg.

Sum høvuðshugsjón aftan fyri hesar broytingar er, at barnið í móðurlívi er sjálvstøðugur skapningur frá gitnað (smbr. við Lejeunne yvirlýsingina), og tí frá hesum tíðarbili eigur lut í teirri rættartrygd, sum [illegible]ður veitt hvørjum borgara í hesum landi. Harnæst vísa royndir, at flestu av teimum fosturtøkum, sum framdar verða her á landi, eru grundaðar á sosialar og sokallaðar medisinskar sosialar grundir. Ikki átti at verið neyðugt í so framkomnum landi sum okkara, at kvinnur (foreldur) skuldu sæð fosturtøku sum einasta útveg í slíkum førum, og tvífalt svárt verður fyri slík, tá hugsað verður um seinfylgjurnar, ið standast kunnu av, at loysa tílíkar sosialar/sosialmedisinskar trupulleikar á henda hátt - nevnast kann her vandin fyri barnloysi, ið kann standast av slíkum atgerðum, og fysiskar og ikki minst psykiskar trupulleikar annars.

1. viðgerð 27. november 1995. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 30. januar 1996 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lugt fram av Miðflokkinum tann 22. november 1995 og eftir 1. viðgerð 27. november 1995 beint í rættarnevndina.

Sambært uppskotinum skal fosturtøka bert verða loyvd, tá neyðugt er at steðga barnsburðinum fyri at forða fyri álvarsomum vanda fyri lívi kvinnunnar.

Samstundis verður skotið upp, at mamman/foreldrini, um hon/tey ikki halda seg før fyri at fullføra barnsburðin og/ella taka sær av barninum, skulu kunnu venda sær til eina serliga nevnd og har fáa hjálp m.a. fíggjarliga og læknaliga.

Rættarnevndin hevur hildið fleiri fundir um málið og hevur boðsent serkonum fólki til fundirnar. Høgni D. Joensen, landslækni, serlæknin í kvinnusjúkum Steintóra Samuelsen, Rodmundur í Líða, yvirlækni, formaðurin í kommunulæknafelagnum Andor Ellefsen og umboð fyri felagsskapin Pro-Vita Karin Kristiansen, sjúkrasystir, formaður, og Petur O. K. Olufsson, sóknarprestur, hava eftir áheitan verið á fundi í rættarnevndini.

Landslæknin Høgni D. Joensen, serlæknin, Steintóra Samuelsen og kommunulæknin Andor Ellefsen, vóru samd um:

1. At galrandi lóg er strong, og at tað ikki er ynskiligt at skerpa hana, vísandi til vandan fyri vaksandi tali av ólógligum fosturtøkum.

2. At eingin ábending er um, at verandi lóg ikki verður bildin.

3. At talið av fosturtøkum í Føroyum er heilt lágt samanborið við londini uttan um okkum. Serliga var her víst á, at talið av fosturtøkum í Føroyum er minkað nógv seinnu árini.

4. At tað er álvarsamt, at tað sambæt uppskotinum ikki skal verða loyvd fosturtøka, tá talan er um álvarsamar arvaligar sjúkur ella neyðtøku.

5. At tað er sera torført at meta um, um og nær lív kvinnunnar er í vanda í sambind við barnsburð.

Út frá hesum mettu Høgni D. Joensen, Steintóra Samuelsen og Andor Ellefsen frá, at lógin verður broytt samsvarandi fyriliggjandi uppskoti.

Umboðini fyri Pro-Vita felagsskapin og Rodmundur í Liða, yvirlækni, hildu verandi lóggávu verða ov frá og hildu tað verða neyðugt, at lógin sigur nakað um at varðveita lív, og tóku hesi umboð tí undir við uppskoti Miðfloksins. Tó helt Rodmundur í Liða, lækni, tað ikki verða ynskiligt, at støðan á hesum øki gjørdist aftur soleiðis, sum hon var fyri árum síðani, tá fosturtøka ikki var loyvd, men tó varð framd ólógliga m.a. av fólki, ið ikki hevði neyðugu úthúgvingina.

Á fundinum hevur nevndin eisini umrøtt ymsar spurningar í sambind við evni, t.d. spurningin um ráðgeving til kvinnur/foreldur í sambind við barnsburð og spurningin um upplýsing viðvíkjandi fyribyrging.

Nevndin hevur soleiðis viðgjørt uppskotið og tað, sum komið er fram á fundunum, sera gjølla, og býtir nevndin seg í ein meirilutan og tveir minnilutar.

M.a. út frá tí, ið komið er fram undir nevndarviðgerðini, mælir meirilutin
(Bjørn á Heygum, Sune Jacobsen, Ingeborg Vinther, Marita Petersen og Signar á Brúnni) til, at lógin verður varðveitt óbroytt, og setir meirilutin í einki uppskot fram.

Ein miniluti umboð Kristiliga Fólkaflokksins **(Lasse Klein)** tekur undir við uppskotinum og hevur annars hesar viðmerkingar:

Uppskotið gongur út uppá, at lívið byrjar í móðurlívinum, tá ið egg og sáðkykna koma saman, og endamálið við uppskotinum er í tveimum:

1) at veita barninum rettartrygd í móðurlívi,
2) at veita mammuni (foreldrunum), sum ikki meta seg før fyri at gjøgnumføra ein barnsburð ella uppala eitt barn, ta hjálpina, teimum tørvar.

Rettartrygdin hevur sambind við, at tað á sama hátt sum eitt barn hevur arvarett frá gitingini og tí frá giting eigur lut í allari tetri rettartrygd, sum veitt verður einum og hvørjum borgara í hesum landi, og tí er tað ikki meira enn rímligt, at rettartrygdin eisini fevnir um t.d. spurningin um fosturtøku.

Rætturin til lív er ein grundleggjandi mannarettur. Hava vit fyrst tikið rettin til lív frá menniskjum, t.d. við at løggilda fosturtøku ella deyðshjálp, so hava øll onnur rettindi ikki longur nakran týdning fyri teir, sum skulu hava gleði og gagn av hesum rettindum, tí teir eru tikin av døgum og fyribeind. Tað eru hesi sjónarmið, sum støða skal takast til.

Rettartrygdina hjá barninum í móðurlívinum tykist lítið verða hugsað um, sjálvt um løgtingið hevur samtykt at foka undir við SÞ-sáttmálanum frá 20. november 1989, ið sigur: "... at barnið vegna líkamligt og sálarligt óbúni hevur tørv á serligari vernd og umsorgan, bæði fyri føding og eftir føding, harundir eisini høskandi løgfrøðiliga verju", eins og Kristiligi Fólkaflokkurin vísti á í løgtingsmáli nr. 121/1993.

11. februar 1992 legði Kristiligi Fólkaflokkurin uppskot á ting í løgtingsmáli nr. 85/1991 móti fosturtøku, men tá fekk uppskotið ikki undirtøku. Hvørja lagni hetta uppskotið fær, er enn ikki greitt.

Eins og vístvarð á undir 1. viðgerð, so er stórur tørvur á ráðgeving, og tí fer minnilutin (Lasse Klein) longu nú at biðja um, at atkvøtt verður um punktini í uppskoti Miðflokksins hvørt sær.

Um so er, at partar av uppskotinum falla, so hava vit kortini skyldu at lata spurningin um ráðgeving standa eftir og at skipa so fyri, at ráðgeving við sakkonum fólki, kann virka á tí grundarlagnum, at barnið í móðurlívi hevur sama rætt til lív sum øll onnur menniskju, og at møguleiki skal vera hjá foreldrunum at koma í samband við læknar, prest, sálarfrøðing, gynækolog, jarðamóður, sosialráðgevara, løgfrøðing o.a.

Sonuleiðis eigur hjálp at verða veitt í samband við barnsburð teimum, sum ongan bústaðarmøguleikar hava, ongar ansingarmøguleikar, ongar útbúgvingarmøguleikar, onga útbúgving, einki arbeiði ella ongan at hava at stuðla seg til v.m. Tá talan er um ráðgeving, metir minnilutin (Lasse Klein), at nr. 6 í uppskotinum nøktar tørvin fyri hetta ráðgeving.

Hin **minnilutin (Jógvan á Lakjuni)** hevur hesar viðmerkingar:

Minnilutin tekur undir við uppskoti Miðflokksins og vísir til tað, sum minnilutin bar fram undir 1. viðgerð av málinum, og til viðmerkingarnar í uppskotinum, har sagt verður, at hevuðslugsjónin aftan fyri hesar broytingar er, at barnið í móðurlívi er ein sjálvstøðugur skapningur heilt frá getnaðinum og tí eigur lut í teirri rettartrygd, sum allir borgarar hava í hesum landi.

Undir viðgerðini í rettarnevndini hava fleiri sakkøn fólk verið inni og sagt sína hugsan um málið. Summi tala fróti, at lógin verður strangari, og vildu heldur, at farið varð hin vegin, meðan onnur taka undir við uppskotinum og mæla til, at alt verður gjørt fyri at minka um fosturtokurnar í Føroyum.

Undir 1. viðgerð varð av minnilutanum (Jógvan á Lakjuni) fort fram, at tað kann ikki vera rætt, at eini 6-8% av øllum barnsburðum í Føroyum enda við fosturtøku, og spurt varð, um lógin, ið vit hava, veruliga er so víð, at hon við tíðarandanum kann tulkast so liberalt, at vit í roynd og veru hava frála fosturtøku.

Sum prógvgrund fyri at varðveita verandi lóg í Føroyum verður mangan fort fram, at Føroyar hava nógv tað lægsta talið av fosturtøkum í øllum Norðanlondum. Men minnilutin (Jógvan á Lakjuni) ivast í, um tað er lógin, sum er orsøkin til tað. Í rettarnevndini varð upplýst, at samanberan vit t.d. við Vesturjótland og eisini við Norður-Vesturnoregi, sum mentanarliga og ætrinaðarliga kanska mest líkjast Føroyum, so er fosturtøkutalið ikki hægri enn hjá okkum, hóast tey har hava frála fosturtøku.

Undir viðgerðini í rettarnevndini er upplýst frá sakkønum fólki á landssjúkrahúsinum, at tað eru kvinnur millum 25 og 35 ár, sum fáa flestu fosturtøkur í Føroyum, og at í allar flestu førum verða fosturtøkurnar loyvdar eftir § 1, stk. 1, nr. 1 í verandi lóg, í sokallaðu "medisinsk-sosialu indikatiónini", har tað stendur, at ein kvinna kann fáa fosturtøku, tá ið álvarsamur vandi er fyri lívi ella heilsu hennara. Síðani stendur - (og eg endurgevi): "Ved bedømmelsen af denne fare skal der på grundlag af en vurdering af samtlige omstændigheder, herunder de forhold, hvorunder kvinden må leve, tages hensyn ikke alene til fysisk eller psykisk sygdom, men også til tilstedeværende eller truende fysiske eller psykiske svækkelsestilstande."

Eftir viðgerðina í nevndini er minnilutin (Jógvan á Lakjuni) blivin meira samtíðar um, at henda lógargrein verður tulkað so liberalt, at talan í veruleikanum er um frála fosturtøku - ella ógvuliga nær tí, og tað kann hann á ongan hátt taka undir við. Stóra skomm heldur minnilutin tað vera, at eitt samfelag sum okkara skal loyva, at truplar sosialar umstøður skulu vera orsøk til, at kvinnur kenna seg noyddar at taka fostrið.

Uppskot Miðfloksins ber í sær, at fosturtøka bert skal verða loyvd, tá ið neyðugt er at steðga barnsburðinum fyri at forða fyri álvarsomum vanda fyri lívi kvinnunnar. Hóast minnilutin (Jógvan á Lakjuni) tekur undir við lógaruppskotinum, so dugir hann eftir viðgerðina í rettarnevndini at sígggja, at tað lítlan kjans hevur fyri at verða samtykt.

Men fyri at tingmenn skulu hava møguleika fyri at vera við til at minka um talið av fosturtøkum, hóast teir ikki halda seg kunna fara so langt sum at taka undir við uppskoti Miðfloksins, so fer minnilutin at setta fram broytingaruppskot, sum júst miðar í móti at minka um talið av fosturtøkum. Hetta kann gerast við at strika tann partin av § 1, nr. 1 í verandi lóg, sum er endurgivin omanfyri.

Verður hetta samtykt, fer ikki at bera til at nýta tuplur sostalar umstøður ella "fysiske eller psykiske svækkelsestilstande" sum orsøk til fosturtøkur, og tað fer at minka heilt nógv um talið av fosturtøkum.

Harumframmt mælir minnilutin til at samtykkja § 1, nr. 5 í uppskoti Miðfloksins við tí broyting, at orðini "ella heilsu" verða sett inn í tekstin soleiðis, at tað samsvarar við § 1, nr. 1.

(Minnilutin (Jógvan á Lakjuni) fer í hesum sambandi at heita á løgtingsformannin um at skipa soleiðis fyri, at atkvøði verður um hvørt nr. sær).

Minnilutin (Jógvan á Lakjuni) setir tí fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

§ 1, nr. 1 í uppskotinum verður orðað soleiðis:
"Tá ið neyðugt er at steðga barnsburðinum fyri at forða fyri álvarsomum vanda fyri lívi ella heilsu kvinnunnar".

§ 1, nr. 5) verður sett
ímillum orðið "lívið" og "kvinnunnar" í fyrstu regla: "ella heilsu".

Forslagets § 1, nr. 1) affattes således:
"Når svangerskabets afbrydelse er nødvendig for at afværge alvorlig fare for kvindens liv eller helbred".

§ 1, nr. 5) indsættes imellem ordet "liv" og "kvindens"i første linie:"eller helbred"

2. viðgerð 13. februar 1996. Uppskot um at beina málið aftur í nevnd fall við 5-2-20 atkvøðum. Broytingaruppskot frá minnilutanum (Jógvan á Lakjuni) fall við 9-1-17 atkvøðum. Upprinnauppskotið fall við 7-2-19 atkvøðum.

13 Tingskipan Føroya Løgtings

Ár 1995, týsdagin 24. oktober legði løgtingsformaðurin fram soljóðandi

U p p s k o t

t í l

samtyktar

Løgtinglð samtykkir at setn eina serliga nevnd við einum umboði úr hvørjum flokki at viðgera og koma við møguligum broytingum í Tingskipan Føroya Løgtings.

Viðmerkingar:

Løgtingið samtykti í seinasta tingsetu uppskot til nýggja tingskipan, sum kom í gildi á ólavsøku 1995.

Málið fekk viðgerð í serligari nevnd við umboðum úr øllum flokkum. Henda nevndin kom til ta niðurstøðu, at málið var so umfatandi, at ikki var gjørligt at geva tí eina nøktandi viðgerð í tí tíðarskeiðinum, nevndin hevði til at leggja fram álit í málinum.

Ein meirihluti setti tá fram soljóðandi uppskot til samtyktar:
"1. Nevndin mælir til, at løgtingið samtykkir framlagda uppskot.
2. Nevndin verður sitandi sum millumtinganevnd og leggur fyri tingið møguligar broytingar í løgtingsmáli nr. 112/1994 í komandi tingsetu."

Hetta uppskot varð samtykt.

§ 27 í nýggju tingskipanini sigur: "Løgtingið kann seta aðrar løgtingsnevndir enn tær, sum nevndar eru í § 25 og § 26 at geva løgtinginum tilmæli í ávísum málum. Hesar nevndir sita bara, til nevndin hevur avgreitt setning sín og í ongum førum longur enn, til tingsetan endar.
Stk. 2. Nevndir, sum settar verða sbr. stýrisskipanarlógina § 19 sita, til tær hava avgreitt setning sín, tó ikki longur enn til, at løgtingsval hevur verið.
Stk. 3. § 15, stk. 4, geldur á sama hátt tær nevndir, umrøddar eru í hesi grein."

Sambært ovanfyrinevndu grein er serliga millumtinganevndin, sum løgtingið samtykti til framhaldandi viðgerð av tingskipanini burturdottin, og tí verður málið lagt fram av nýggjum, og mælt verður til, at uppskotið fær tríggjar viðgerðir.

Viðlagt er: Álit um tingskipan Føroya Løgtings 1995. Løgtingsmál nr. 112/94. Tingskipan Føroya Løgtings og álit í løgtingsmáli nr. 112/1994: Tingskipan Føroya Løgtings.

1. viðgerð 27. oktober 1995. Málið varð beint beinleiðis til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

3. viðgerð 2. november 1995. Málið endaliga samtykt við 28-0-0 atkvøðum.

Serlig løgtingsnevnd til at viðgerða løgtingsmál nr. 13/ 1995: Tingskipan Føroya Løgtings.

Vald á Føroya Løgtingi 2-11-95

Fyri:

Sambandsflokkin	*Sunn Jacobsen*
Fólkaflokkin	*Anfinn Kallsberg*
Javnaðarflokkin	*Vilhelm Johannesen*
Tjóðveldisflokkin	*Finnbogi Isakson*
Verkamannafylkingin	*Ingeborg Vinther*
Sjálvstýrisflokkin	*Helena D. á Neystabø*
Kristiliga Fólkaflokkin	*Lasse Klein*
Miðflokkin	*Thordur Niclassen*

14 Løgtingslóg um viðbót til ávísar pensionistar v.fl.

Ár 1995, hósdagin 2. november legði Andrias Petersen, landsstýrismaður fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um viðbót til ávísar pensionistar v.fl.

§ 1. Í fíggjarárinum 1995 verður úr landskassanum veitt ein viðbót til pensionistar við 1.805 kr. til hvønn pensionist.

§ 2. Viðbótin verður latin til fólk, ið áðrenn 1. desember 1995 hava fingið játtaða fólkapensión, avlamispensión ella einkjupensión ella hava sent inn umsókn um slíka pensión, tí at rætturin til hana er uppnáddur, og seinni fáa pensiónina játtaða.

§ 3. Treytin fyri at fáa viðbótina er, at pensiónisturin ikki hevur hægri ársinntøku út um pensiónina enn 80.000 kr. fyri hjón og 60.000 kr. fyri støk. Til grund fyri útrokningini verður lagd inntøkan, sum nýn verður í sambandi við útrokning av pensiónini pr. 1. desember 1995. Hjúnafelagar, sum bæði eru pensiónistar, eiga ein part í felag.

§ 4. Í fíggjarárinum 1995 verður úr landskassanum eisini veitt ein viðbót við 1.805 kr. til fólk, sum tann 1. desember 1995 fáa hjálp sambært § 13 í forsorgarlógini, undir sama treytum sum fyrisett í § 3 í hesi lóg.

§ 5. Viðbótin verður úlgoldin av Føroya gjaldstovu.
Stk. 2. Annars hevur Almannastovan fyrisitingina av viðbótini um hendi.
Stk. 3. Avgerðir, sum Almannastovan hevur tikið, kunnu innan 4 vikur kærast til Kærunevndina í almannamálum.

§ 6. Viðbótin er ikki skattskyldug.

§ 7. Hendan lóg fer gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar:

Við løgtingslóg nr. 51 frá 12. maí 1995 varð fyrsta ferð samtykt at veita fólka-, avlamis- og einkjupensionistum brennistuðul. Stuðulin var frá 1980 til 1987 nevndur brennistuðningur, men hetta varð frá 1988-1994 broytt til brenni- og samskiftisstuðningur. Í ár verður stuðulin nevndur viðbót.

Stuðulin frá 1980 til 1987 var ætlaður sum ískoyti til oljugjald, og stuðulin frá 1988 til 1994 ætlaður sum ískoyti til olju-, sjónvarps- og útvarpsgjald. Í ár er stuðulin ætluður sum eitt meira ulment ískoyti til pensiónina til teir pensionistar, sum fíggjarliga eru verst fyri.

Yvirlit yvir tal upphædd, sum hvør pensionistur fekk í tíðarskeiðnum 1980-1994:

80/81	81/87	88/89	90/91	1992	1993	1994
900	1.200	2.200	1.943	1.928	1.569	1.850

Yvirlit yvir tal av pensionistum, sum fingu stuðul í tíðarskeiðnum 1989-1994:

1989	1990	1991	1992	1993	1994
3.270	3.294	3.370	3.454	3.554	3.566

Útrokningargrundarlagið fyri viðbótina fyri 1995 er 3.600 pensionistar í mun til játtaðu upphæddina í 1995 uppá 6,5 mió kr. T.v.s. kr. 1.805,- til hvønn pensionist sum lýkur treytirnar í lógini.

1. viðgerð 7. november 1995. Málið varð beint í trivnaðarnevndina, sum 22. november 1995 legði fram sa-

fjórðandi

Á lit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 2. november 1995 og eftir 1. viðgerð 7. november 1995 beint í trivnaðarnevndina.

Málið er viðgjørt í nevndini og tekur ein sámd nevnd undir við uppskotinum, sum tað fyriliggur frá landsstýrinum.

2. viðgerð 27. november 1995. Samykt at henda málið til 3. viðgerð við 29-0-0 atkvøðum.

3. viðgerð 1. desember 1995. Uppskot landsstýrisins endaliga samykt við 19-0-0 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 158 frá 6. desember 1995.

F.L. j.nr. 1010-491.

15 Broyting í løgtingslóg um skúlafyrisiting

Ár 1995, hósdagin 2. november legði Andrias Petersen, landsstýrismaður, vegna Eilif Samuelsen, landsstýrismann, fram saljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skúlafyrisiting.

Í løgtingslóg nr. 58 frá 2. oktober 1978 um skúlafyrisiting, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 95 frá 13. juni 1995, verða gjørdar hesar broytingar:

§ 1.

1) Sum nýggj § 7 verður sett:
"**§ 7.** Skúlamyndugleikin á staðnum er bygdarráðið/býráðið og skúlanevndin.
Stk. 2. Í hvørjari kommunu verður vald ein skúlanevnd við í mintsta lagi 3 og í mesta lagi 7 limum eftir nærri av landsstýrinum ásettum reglum.
Stk. 3. Skúlanevndin verður vald samstundis og eftir sonnu reglum sum bygdarráðið/býráðið.
Stk. 4. Eftir umsókn frá býráð/bygdaráð ella skúlanevnd kann landsstýrið eftir tilmæli frá landsskúlaráðunum loyva, at ein kommuna verður býlt í fleiri øki, hvørt við síni skúlanevnd."

2) Sum nýggj § 41 verður sett:
"**§ 41.** Henda lóg fer úr gildi 1. januar 1997."

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar:

Í samband við nýggju stýrisskipanarlógina (løgtingslóg nr. 103 frá 26. juli 1994 um stýrisskipan fyri Føroyar) hava verið gjørdar broytingar í ymsum lógum, tillagaðar til nýggju stýrisskipanina. Lógin um skúlafyrisiting varð broytt við løgtingslóg nr. 95 frá 13. juni 1995. Í hesi broytingarlóg er ásett, at lógin um skúlafyrisiting øll sum hon er, skal fara úr gildi 1. januar 1996.

Vísandi til, at landsstýrið er í ferð við at at seta eina nevnd at gera eina djúptøkna endurskoðan av skúlafyrisitingarlóggávuni, metir landsstýrið tað vera neyðugt at framleingja lógina eitt ár. Tí mælir landsstýrið løg-

tinginum til at samtykkja lógaruppskotið, sum ber í sær, at lógin um skúlafyrisiting verður framlongd til 1. januar 1997.

Viðvíkjandi § 1, 1) verður víst til serligu viðmerkingarnar niðanfyri.

Serligar viðmerkingar:
Ad. § 1, 1): Í álitinum til løgtingsmál nr. 98/1994: Broyting í løgtingslóg um skúlafyrisiting kom ein villa í, sum førdi við sær, at tær reglur, sum galdandi vóru í § 7 undan lógarbroytingini frá 13. juni 1995, (løgtingslóg nr. 95 frá 13. juni 1995 um broyting í løgtingslóg um skúlafyrisiting), fullu burtur. Hesar reglur vóru um skúlamyndugleikan. Skoti verður upp at setu hesar reglur í gildi aftur við eini nýggjari § 7.

1. viðgerð 7. november 1995. Málið varð beint í mentanarnevndina, sum 13. desember 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 2. november og eftir 1. viðgerð 7. november beint í mentanarnevndina.

Mentanarnevndin hevur á fundi tann 1. desember 1995 viðgjørt málið.

Ein samd nevnd heitir á landsstýrið um at fara í holt við at gera tær neyðugu broytingarnar, sum skulu tillagast fyrisitingarlógini, soleiðis at sloppið verður undan aftur at koma í tíðsneyð við lógararbeiðnum.

Nevndin mælir til, at § 1, pkt. 2, verður broytt so, at framlagda lógaruppskotið fer úr gildi á ólavsøku 1996, samstundis sum lógin um ábyrgd landsstýrismanna kemur í gildi.

Við hesum grundgevingum setir nevndin fram broytingaruppskot til uppskot landsstýrisins:

Broytingaruppskot

§ 1, pkt. 2, verður orðað soleiðis:
"Sum nýggj § 41 verður sett:

"§ 41. Henda lóg fer úr gildi 1. august 1996."

Nevndin mælir tinginum til at taka undir við uppskoti landsstýrisins við hesum broytingum.

2. viðgerð 18. desember 1995. Broytingaruppskot nevndarinnar samtykt við 23-0-0. Samtykt at beina málið soleiðis broytt til 3. viðgerð við 23-0-0 atkvøðum.

3. viðgerð 21. desember 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 32-0-0 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 164 frá 22. desember 1995.

F.L. j.nr. 2100-6/92.

16 Nýval av nevndum

Ár 1995, mánadagin 13. november bað løgtingsformaðurin um frávik frá tíðarfreistini til at leggja fram løgtingsmál um nýval av nevndum.

Frávik varð ikki givið.

17 Frískúlar og privatir grundskúlar v.m.

Ár 1995, mánadagin 11. desember legði Óli Breckmann, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi

Uppskot

til

<u>Løgtingslóg</u> um frískúlar og privatar grundskúlar.

<u>§ 1.</u> Einstaklingum, samkomum, felagsskapum o.ø. er loyvt sambr. hesi rammulóg at seta á stovn frískúlar og privatar grundskúlar, framhaldsdeildir og miðnámsútbúgvingar.

<u>§ 2.</u> Landsstýrið góðkennir stovnsetan av slíkum skúlum eftir sama reglum um m.a. kostnað, næmingatal, lærarakreftir og høliskumstøðuir, sum eru galdandi fyri almennu skúlarnar.

<u>§ 3.</u> Hesir frískúlar skulu í minsta lagi lúka frálæru krøv og prøvstøði fólkaskúlans, men eru annars frítt stillaðir at leggja aftrat innihaldinum sambr. serskildum endamálum frískúlanna.

<u>§ 4.</u> Landsskúlafyrisitingin hevur skyldu at stuðla við serundervísing, vegleiðing, frálæruhjálpari o.ø. í vanligum lærugreinum, har leiðsla hins einstakra frískúlans ynskir tað.

§ 5. Møguleg bygging ella leiga av egnaðum skúlahølum verður fíggjað av løgtingi og kommunum á sama hátt og í sama mun sum verandi almennu skúlar.

<u>§ 6.</u> Raksturin til hesar skúlar verður fíggjaður á tann hátt, at almenn gjaldsvánan frá landi og kommunum, sum svarar til verandi kostnað av frálæru pr. næming í almennu skúlunum, verður latin foreldrunum, t.e. fylgir barninum, og kann bert brúkast til hetta frálæruendamál.

<u>§ 7.</u> Frískúlarnir hava rokniskaparskyldu sum almennir skúlar o.a. stovnar.

§ 8. Foreldraráð og lærarar hava í felag ábyrgd av rakstri og frálæruni á hesum frískúlum.

<u>§ 9.</u> Skúlastjórin hevur ábyrgd av dagliga rakstrinum og rokniskaparskyldum hjá frískúlanum.

§ 10. Fylgilógir og reglugerðir verða gjørdar sambr. hesi rammulóg í tráð við líknandi frískúlar í grannalondum okkara.

<u>§ 11.</u> Henda lógin fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar:

Endamálini við hesi lóg eru:

1. At geva foreldrum og børnum møguleika at velja sær besta skúlan og úthugvingina, um tey eru ikki nøgd við almenna eindarskúlan ella hava lug til, at børnini skulu fáa serskilda vitan umfram vanliga úthugving.

2. At samfelagið gagnnýtir betur enn nú tær 450 mió. kr., sum almenna skúlaverkið kostar landi, stati og kommununum árliga, svarandi til 50.000 kr. pr. næming pr. ár.

Lærdómur er lættur at bera. Høgt útbúgvingarstøði er ein hornasteinur undir trivnaði og menning í einum samfelag. Á hesum øki hava føroyingar roynt at hildið okkum á hædd við okkara grannalond í tann mun, fólkagrundarlag, lærarakreftir og fíggjarorka hava loyvt tí.

Men mótsett øðrum londum hava vit sjálv bert rindað helvtargjald av tí, sum skúli og útbúgving í Føroyum hava kostað. Danir hava goldið hin helmingin. Hetta lógaruppskotið bevur ikki til endamáls at broyta hetta tvíbýtið, sum fíggjarvánirnar eru, men er heldur ikki forðan fyri, at kostnaðarbýtið verður broytt.

Heldur miðar uppskotið ímóti at fleirtátta møguleikarnar hjá foreldrum at velja tann skúla, ta útbúgving, siðvenju, átrúnað og tað frálæruinnihald, sum best verður tryggjað í eini frískúlaskipan við sjálvstøðugum skúlum á øllum aldurstigum, har foreldur og lærarar, sum ynskja at leggja meir í skúlaskapin enn minstakrav landsmyndugleikanna, fáa høvi til tess.

Eisini hevði ein frískúlaskipan lært okkum at fingið mest innihaldsvirði fyri tann pening, sum okkara samfelag nýtir til at menna kunnleikastøði ungdómsins.

Ein holl skúla- og útbúgvingarskipan kostar einum samfelag nógvan pening. § 14 á løgtingssfíggjarlógini. "Útbúgving og gransking" leggur hald á 390 mió. kr. í komandi fíggjarári. Harumframt kemur kommunanna íkast, sum í fleiri førum umboðar størstu einstøku fíggjarskyldu teirra.

Siga vit, at skúlaskapur tilsamans kostar upp móti 500 mió. kr. árliga, og at tað eru umleið 10.000 føroyingar í útbúgving frá 1. flokki í barnaskúlanum upp til handils- ella studentsskúla, kostar hvør næmingur uml. 50.000 kr. árliga.

Eyðvitað kostar hvør eldri næmingur meir enn hvørt barn í fólkaskúlanum, men tað er hugvekjandi at hugsa sær, at ein miðal, føroysk skúlastova við t.d. 15 næmingum umboðar ein samfelagskostnað ella -íløgu upp á 750.000 kr. árliga, (svarandi til 4 ársinntøkur hjá einum tímaløntum ella 3 læraraárslønir.

Hetta uppskotið miðar móti, at almennu játtanirnar fylgja næmingunum, mótsett verandi skipan, nú almennu játtanirnar til skúlaverkið (undantikið lestrarstuðul) fara til skúlarnar og til lærararnar.

Hugsanin við hesum uppskoti er, at foreldur at skúlabørnum, og myndugu næmingarnir fáa størri valfrælsi til at útbúgva børnini. Foreldur at børnum í skúlaaldri (seinri næmingurin sjálvur) fáa eftir hesum uppskoti eina gjaldsváttan frá myndugleikunum við skúlaársbyrjan, sum tey so kunu lata tí skúla, tey velja til síni børn. Hetta gjaldsprógv kann skúlin so innloysa á Gjaldstovuni aftur fyri reiðan pening at fíggja (frí)skúlans virksemi við. Gjaldsváttanin kann bert í hesum føri galda útbúgving.

Henda uppskotna skipan hevði ført til, at tað verður gjørligt hjá hvørjum (frí)skúla sær at arbeiða meiri innanhýsis við at fáa eitt so gott og dándigt innihald fyri næmingar og foreldur sum gjørligt. Dugnaligar skúlaleiðslur høvdu fingið meir útbúgvingarvirði fyri pengarnar og kundu handlað fríari innanhýsis millum býtið av inntøkum sínum.

Verandi almenna eindarskúlaskipan gevur onga vissu fyri bestu gagnnýtslu av almennu játtanini til rakstur. Allur skúlaskapur verður skorin eftir sama leisti. Seinasta skipið í konvoyini avger ferðina hjá øllum. Mest óskikkaðu pedagogarnir eru lægsti felagsnevnari og dømta næmingarnar til tilsvarandi kunnleikastøði. Góðir lærarar hava sum er ongan rætt til betri lønarúrslit enn vánaligir lærarar. Tað er órættvíst móti teim góðu kennarunum og uppalarunum innan skúlagátt. Foreldur og børn noyðast uttan valfrælsi at góðtaka vánaligar skúlar og hava onga aðrastaðni at fara fyri at tryggja børnum sínum betri frálæru.

Verandi skúlaskipan er innrættað og lønarlagið skipað so, at tað eggjar ikki skúlum og lærarum til nýhugsan. Fingu teir samsýning eftir avrikum, ágrýtni og evnum at læra frá sær, varð meir burturúr hjá teim, ið mest spentu seg út.

Hetta gerst best, um skúlin verður innrættaður so, at foreldur fáa eitt fíggjarligt valfrælsi til at senda síni børn til tann skúlan, sum tey halda, gevur børnunum mest fyri peningin. Tann rætt hava borgarar sum brúkarar í flest øðrum viðurskiftum og áttu eisini at fingið hann í skúlavalinum til børnini.

Um vit løgdu skúlaverkið undir eitt slag av marknaðarskipan, hevði samfelagið í longdini ikki bert fingið meir fyri tann prís, ið útbúgving kostar, men eisini spart pening umsíður. Betri hylling hevði fingist á, hvat skúlaskapur veruliga er verður í peningi. Verandi 50.000 kr. árliga fyri hvønn næming í miðal ljóðar nevniliga í bægra lagi, sammett við so mangt annað.

Viðvíkjandi skúlabygningum er at siga, at fíggjarkreppan rekur vaksandi tal av barnafamiljum av landinum. Tað verður rúmligari í fleiri skúlum, og nakrir verða helst niðurlagdir ella til avlops um stutta tíð. Tað skuldi glvið møguleika hjá frískúlum, sum verða stovnaður eftir hesi lóg, at fingið innivist í egnaðum hølum.

Talan er eisini um sama næmingatal (sum heldur fram at falla, líka til fortreytirnar fyri verandi kreppu eru broyttar við minni skattatrýsti og lægri kostnaðarstøði), so í tann mun, sum foreldur velja sær aðrar skúlar enn teir almennu til børnini, verða almennu skúlarnir tómir til at yvirtaka av frískúlum sum sjálvseigandi stovnum.

Øll okkara grannalond hava skipan um frískúlar og privatar grundskúlar eins og líknandi valfrælsi fyri miðnámsútbúgvingar. So hetta lógaruppskot hevur í grundini sum høvuðsendamál at tryggja minst sama útbúgvingarstøði sum í grannalondum okkara.

Seinast, uppskotið varð lagt fyri tingið, førdi meirilutin í Skúla- og mentannarnevndini fram, at verandi rammulóg fyri skúlaverkið veitir møguleika fyri stovnan av frískúlum, men av tí, at eingin frískúli er komin enn, 17 ár eftir, at galdandi skúlalóg kom í gildi, er neyðugt at gera serskilda lóg fyri frískúlar.

Fíggjarliga avleiðingin av uppskotinum verður í fyrstu syftu, at samlaða játtanin á fíggjarlógini til "útbúgving, gransking o.a." verður óbroytt, men fylgir barninum, t.e. verður ávíst foreldrunum sum gjaldsprógv, ið tey kunnu nýta til at tryggja børnunum bestu útbúgving á tí skúla, teimum líkar best. Uppskotið kostar eingi nýggj skúlahøli. Men við tíðini kemur kapping millum verandi skúlar um næmingar, og tað førir við sær lægri kostnað pr. barn og meiri nyttu fyri peningin, sum samfelagið vil játta til hetta endamál.

Landsskúlafyrisitingin er so væl mannað, og teir einstøku skúlarnir hava so nógv av lærarakreftum, samstundis sum næmingatalið fellur, at uppskotið kann setast í verk og umsitast, uttan at neyðugt er at seta fleiri fólk.

1. viðgerð 16. januar 1996. Málið varð beint í mentannarnevndina, sum 26. apríl 1996 legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av fólkaflokkinum tann 11. desember 1995 og varð eftir 1. viðgerð 16. januar 1996 beint í mentannarnevndina.

Til tess at geva málinum eina so gjølliga viðgerð sum møguligt, hevur mentannarnevndin hildið fund við umboð fyri Landsskúlafyrisitingina, landsstýrismannin í skúlamálum og umboð fyri Adventistaskúlan Tórshavn.

Umboðini fyri Landsskúlafyrisitingina høvdu tað grundsjónarmið, at fólkaskúlin hevur og altíð eigur at hava so rúmligar karmar og so vavmikið innihald, sum hóskandi er fyri fólksins almenna skúla, og at tað tí ikki er tørvur á privatskúlum/frískúlum her á landi, og at okkara fámenta fólk eigur í fruktagóðum samstarvi íðiliga at menna og laga henda skúla soleiðis, at hann altíð til fulnar kann røkja tær uppgávur, á hann eru lagdar, og at vit við støði í hesum grundsjónarmiðum og við øktum samstarvsvilja kunnu varðveita ein fotfalsliga ódýran fólkaskúla, og at hesin eini og sami fólkaskúli sum tryggjar øllum bornum eina forsvarliga undirvísing á jøvnum føti, tí er tann best hóskandi undirvísingarkarmur í einum so lítlum samfelagi sum okkara.

Landsskúlafyrisitingin bar uppá mál, at vit í staðin fyri skúlanevndini áttu at fingið skúlastýri fyri tann einstaka skúlan. Skúlastýrini skuldu verið vald av foreldrum og við foreldrum, sum áttu næmingar í skúlanum. Á henda hátt gerst foreldraávirkanin sterkari, enn hon er í verandi lóggávu.

Landsstýrismaðurin í skúlamálum tók ikki undir við uppskoti fólkafloksins. Grundgevingarnar fyri hesum vóru í høvuðsheitum, at samfelag okkara er so lítið, skúlabarnatalið er yvirhøvur minkandi og fíggjarliga tilfeingið er avmarkað. Nevndar vórðu eisini tær nógvu skerjingar, sum eru gjørdar á skúlaøkinum seinastu árini, og at frískúlarnir, so sum uppskotið er orðað, skulu fíggjast heilt og fult av almennum peningi. Ofta verða frískúlar stovnsettir fyri at fremja einahvørja ideologiska hugsjón - politiska ella átrúnaðarliga. Í einum líttlum samfelag sum okkara, kann lógarfest heimild vera við til at skapa eina óhepna spjaðing millum fólk.

Landsstýrismaðurin gjørdi somuleiðis vart við, at fólkaskúlalógin - bæði í verandi skapi og samb. fyriliggjandi áliti til nýggja fólkaskúlalóg - er breið og hevur rúm fyri nógvum tiltøkum og aktivitetum, so at tað ber til at leggja undirvísingina soleiðis til rættis, at ynskini hjá foreldrunum í stóran mun kunnu gangast á møti innan lógarinnar karmar.

Umboðini fyri Adventistaskúlan Tórshavn greiddu frá, at teirra skúli varð stovnaður í 1964, og at hann fekk almennan studning útgoldnan eftir einari tágaldandi danskari frískúlalóg frá 1953, ið veitti 85% í studningi til læraralønir, men einki til annan rakstur. Í dag verður stuðulin veittur av Landsskúlafyrisitingini samb. galdandi lóg.

Í 1994 hevði skúlin 84 næmingar og kostaði tað 1.8 mill. kr. at reka. 1.1 mill. kr. komu frá Landsskúlafyrisitingini, meðan restin varð fíggjað soleiðis:

1. Tórshavnar kommuna
   umleið 80.000 kr.
2. Foreldragjald
   umleið 300.000 kr.
3. Adventistasatnkoman
   umleið 300.000 kr.

Foreldragjaldið er 5000 kr. um árið fyri hvørt barnið. Systkin fáa avslátt.

Áhugin fyri at koma inn á henda skúla er stórur. Fleiri søkja, enn pláss er fyri. 70 børn eru longu nú skrivað upp til at byrja í 1. flokki tey komandi árini fram til ár 2003.

Umboðini fyr Adventistaskúlan Tórshavn løgdu dent á, at tað ikki eru hert væl stillaði fólk, sum velja skúlan. Nógvar einsamallar mammur og fleiri arbeiðsleys foreldur hava børn gangandi á skúlanum. Skúlin roynir ikki at síla tey veiku børnini frá, men tekur sín part.

Umboðini fyri Adventistaskúlan Tórshavn hildu, at uppskotið um at lata eina peningaupphædd fylgja hvørjum barnið hevði virkað rættvíst og sosialt, tí tað gevur eisini frælst til at velja hjá teimum, sum fíggjarliga eru verri fyri.

Nevndarlimirnir Jógvan Adolf Johannessen, Marita Petersen, Signar á Brónni, Maria Hansen og Sune Jacobsen taka ikki undir við uppskoti fólkafloksins, men vísa á, at í verandi fólkaskúlalóg eru møguleikar at leggja undirvísingina soleiðis til rættis, at ynskini hjá foreldrunum í stóran mun verða gingin á møti.

Somu halda, at tað er rætt leið at ganga, at vit í staðin fyri skúlanevndir eiga at fáa skúlastýri fyri tann einstaka skúlan, ið ber í sær, at foreldraávirkanin gerst størri, enn hon er í verandi lóggávu og mælir landsstýrinum til, at leggja fram uppskot um nevndu broyting.

Nevndarlimur fólkafloksins Bjarni Djurholm tekur undir við uppskoti fólkafloksins, og forir annars fram, at undir 1. viðgerð av løgtingsmálinum um frískúlar kom greitt til sjóndar, at ivi er um verandi fólkaskúlaskipan megnar at loysa tær uppgávur henni eru álagdar.

Hóast flestu framsøgumenninir ikki kundu geva tilsøgn um undirtøku fyri uppskotinum, so var semja um, at neyðugt er við broytingum, so fólkaskúlin í størri mun kann tryggja, at lærdómurin, ið veittur verður børnunum, altíð er ájavat við tær alsamt broyttu umstøðurnar og krøvini í samfelagnum. Tað hevur verið

fört fram undir nevndarviðgerðini, at verandi lóg um skúlafyrisiting hetmilar einstaklingum og øðrum at seta á stovn friskúlar. Sambært hesum sjónarmiðum er tí ikki neyðugt við serligari lóggávu á økinum.

Tað er tó greitt, at sera trupult er at fáa fjóð fyri alternativum skúlum hjá myndugleikunum, og eru tí allar umsóknir um loyvi farnu árini afturvístar.

Í skúlafyrisitingarlógini § 27 stendur m.a. "...tílíkir skúlar mugu bert góðkennast, um so er, at tað er ein rímiligur tørvur á hesum." Tørvsmetanin higartil sýnist at hava verið ávirkað av áhuganum at fjálga um verandi skipan.

Tað er tí neyðugt við lógarbroyting í fyrisitingarlógini.

Fram er komið í seinastuni, at ætlanin er at stongja fleiri av bygdaskúlunum. Við teirri ávirkan skúlar allastaðni hava á nærumhvørvið, fer missurin at ávirka bygdalívið munandi.

Tí er væntandi, at størri áhugi sum frálíður verður fyri at verja tey sjálvsøgdu demokratisku rættindi, sum tryggja einstaklingum møguleikar at seta á stovn friskúlar runt landið.

At besi demokratisku rættindi, undir verandi lóggávu, hava trongar karmar, er einasti friskúlin í landinum hesta dømið um. Hesin skúli kennir dagliga avleiðingarnar av avmarkaðu umstøðunum, samfelagið bjóðar friskúlum, og er hann tí eitt sjónligt dømi um, at tørvur er á greiðari og liðiligari lóggávu á skúlafyrisitingarøkinum.

Tí eigur løgtingið longu nú at taka undir við lógarbroyting á hesum álvarsøki.

Nevndarlimur miðfloksins Jenis av Rana førir fram, at í Føroyum er í dag undirvísingarskylda, men ikki skúlaskylda. Spurningurin er tí, um myndugleikarnir hava loyvi til ikki at stuðla teimum horgarum sínum, sum skuldu valt at latið børn síni gingið í aðrar skúlar enn tann almenna fólkaskúlan, á jøvnum føti við tey, ið njóta undirvísing fólkaskúlans.

Umráðandi er at fáa júst hendan spurningin svaraðan, og fer Miðflokkurin at taka stig til hetta.

Fyriliggjandi uppskoti um friskúlar og privatar grundskúlar v.m. tekur Miðflokkurin undir við, tó orðalagið og innihaldið í størsta partinum av viðmerkingunum fellur okkum fyri bróst, og taka vit avstand frá meginpartinum av tí, sum í hesum verður fört fram.

2. viðgerð 30. apríl 1996. Uppskotið fekk 8-4-12 atkvøður og fall.

18 Broyting í løgtingslóg um ásetan av almannaveitingum

Ár 1995, týsdagin 5. desember legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, vegna Andrias Petersen, landstýrismann, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ásetan av almannaveitingum.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 117 frá 2. desember 1994 um ásetan av almannaveitingum verður gjørd henda broyting:

Í § 3 verður "31. desember 1995" broytt til "31. desember 1996".

§ 2.

Henda løgtingslóg fer gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar:

Við løgtingslóg nr. 117 frá 2. desember 1994 vóru almannaveitingarnar fyri fyrstu ferð ásettar av løgtinginum. Upphæddin á teimum ymisku almannaveitingunum hava verið tær sama síðani 1. juli 1993, og samlagt løgtingslógini um ásetan av almannaveitingum, verður hetta galdandi fram til 31. desember 1995. Tá fer verandi løgtingslóg um ásetan av almannaveitingum úr gildi.

Samstundis sum løgtingslógin um ásetan av almannaveitingum varð samtykt, samtykti løgtingið somuleiðis at áleggja landsstýrinum at leggja fyri tingið lógaruppskot við reglum um áseting av almannaveitingum, har heimilað verður landsstýrinum við kunngerð at ásetta greiniligari reglur um fyrisitingina av hesari skipan.

Landstýrið hevur skilt hetta soleiðis, at løgtingið við hesum hevur álagt landsstýrinum at koma við uppskoti um, hvussu upphæddin á almannaveitingunum eigur at javnast, soleiðis at tann árliga ásetanin av almannaveitingunum verður ein fyrisitingarlig avgerð, sum landsstýrið sjálvt tekur sær av.

Tað eru fleiri hættir at javna almannaveitingarnar. Í flestu granalondunum verður ein ella annar formur fyri lønar- ella prístaljavnan nýttur. Ein annar háttur er at velja eitt fast prosenttal at javna almannaveitingarnar eftir. Ein triðji háttur er, at støða verður tikið til stødið á almannaveitingunum saman við fíggjarlógarviðgerðini, og at landsstýrið síðani í mun til játtaðu upphæddina á fíggjarlógini, ásetir almannaveitingarnar fyri t ár í senn.

Landsstýrið hevur á fundi tann 29. november 1995 samtykt at seta ein arbeiðsbólk, sum skal gera nágreiniligari útrokningar um, hvat árligi kostnaðurin má metast at verða, um almannaveitingarnar verða javnaðar eftir prístalinum ella lønarútviklinginum. Eftir ætlan skal arbeiðsbólkurin verða liðugur við arbeiði sín einaferð í vár.

Av tí at verandi lóg fer úr gildi 31. desember 1995 verður skotið upp, at lógin verður longd, so hon verður verandi í gildi í eitt ár afturat. Landsstýrið fer síðani – vøntandi um miðjan 1996 – at leggja fram eitt uppskot um javnan av almannaveitingum.

Fíggjarligu avleiðingarnar av at leingja verandi lóg eru ongar, av tí at landsstýrið í uppskoti sínum til fíggjarlóg fyri 1996 ikki hevur roknað við nakrari hækking av almannaveitingunum.

1. viðgerð 11. desember 1995. Málið varð beint beinleiðis til 2. viðgerð.

2. viðgerð 14. desember 1995. Samtykt at beina málið til 3. viðgerð við 19-0-0 atkvøðum.

3. viðgerð 18. desember 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 26-0-0 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 173 frá 22. desember 1995.

EL j. nr. 1010-10/93.

19 Broyting í løgtingslóg um samsýniug og eftirløn løgtiugsmanna

Ár 1995, tysdagin 5. desember legði løgtingsformaðurin fram soljiðandi

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um samsýning og eftirløn løgtingsmanna.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 11 frá 8. januar 1993 um samsýning og eftirløn løgtingsmanna verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 1, stk. 3, verður orðað soleiðis:
"Løgtingsformaðurin verður løntur í 39. lønarflokki í tænastumannalógini, tó fær løgtingsformaðurin ikki fundarpening."
2) § 1, stk. 4, verður orðað soleiðis:
"Formenninir í løgtingsnevndunum sbrt. §§ 25 og 26 í Tingskipan Føroya Løgtings og varaformenninir í formansskapi løgtingsins fáa kr. 30.000 árliga. Formenninir í løgtingsnevndum sbrt. § 27 í Tingskipan Føroya Løgtings fáa kr. 2.500 um mánaðin."
3) Sum nýtt § 1, stk. 5 verður sett:
"Næstformenninir í løgtingsnevndum fáa dupultan fundarpening, tá teir taka við eftir § 31 í Tingskipan Føroya Løgtings."
4) § 1, stk. 6 verður orðað soleiðis:
"Limirnir í løgtingsnevndunum sbrt. §§ 25-27 og varaformenn í formansskapinum fáa fundarpening eins og tænastumenn landsins fyri fundir, ið hildnir verða teir dagar, tá tingið ikki hevur fund. Er talan um fleiri fundir ein dag, kann samlaði fundarpeningurin ikki fara upp um fundarpening fyri ein dag eftir galdandi reglum."
5) § 1, stk. 7, verður strikað.

§ 2.

Henda lóg fær gildi frá 29. juli 1995.

Stk. 2. Broytingin viðvíkjandi samsýning til figgjarnevndarformannin fær tó gildi frá 1. januar 1996. Til henda broyting fær gildi, hevur § 1, stk. 3 í løgtingslóg nr. 11 frá 8. januar 1993 um samsýning og eftirløn løgtingsmanna framvegis gildi viðvíkjandi omanfyrinevndu samsýning.

Lagtingslov om ændring i lagtingslov om vederlag og pension til lagtingsmænd.

§ 1.

I lagtingslov nr. 11 af 8. januar 1993 om vederlag og pension til lagtingsmænd foretages følgende ændringer:

1) § 1, stk. 3, affattes således:
"Lagtingsformanden aflønnes i henhold til tjenestemandsloven lønramme 39, dog får lagtingsformanden ikke mødehonorar."
2) § 1, stk. 4, affattes således:
"Lagtingsudvalgs formændene jfr. §§ 25 og 26 i Færøernes Lagtings forretningsorden og viceformændene i lagtingets præsidium får kr. 30.000 årlig. Formændene i lagtingsudvalgene jfr. § 27 i Færøernes Lagtings forretningsorden får kr. 2.500 månedlig."
3) Som ny § 1, stk. 5, indsættes:
"Lagtingsudvalgenes viceformænd får dobbelt mødehonorar, når de overtager efter § 31 i Færøernes Lagtings forretningsorden."
4) § 1, stk. 6, affattes således:
"Lagtingsudvalgenes medlemmer jfr. §§ 25-27 og præsidiets viceformænd får mødehonorar ligesom landets tjenestemænd for møder, der holdes de dage, når tinget ikke har møde. Hvis der er talen om flere møder på en dag, kan det samlede mødehonorar ikke overstige det mødehonorar for en dag efter gældende regler."
5) § 1, stk. 7, udgår.

§ 2.

Denne lov træder i kraft fra 29. juli 1995.

Stk. 2. Ændringen vedrørende honorar til finansudvalgets formand træder dog i kraft fra 1. januar 1996. Indtil denne ændring træder i kraft, bevarer § 1, stk. 3 i lagtingslov nr. 11 af 8. januar 1993 om vederlag og pension til lagtingsmænd sin gyldighed vedrørende ovennævnte honorar.

Viðmerkingar:

Eftir at nýggj lóg um stýrisskipan Føroya og Tingskipan fyri Føroya Løgting eru settar í gildi óhavsokudag 1995, eru krøvini til løgtingsformannin, varaformenninar í formannsskapinum, nevndarformenninar í løgtingsnevndunum og nevndarlimirnar í løgtingsnevndunum sbrt. §§ 25-27 í tingskipanini vorðin munandi tyngri, og hevur løgtingsformaðurin sambært ásetingunum í tingskipanini §§ 18-20 fingið eina avgerandi ábyrgd.

Verandi lóggáva um samsýning og eftirløn løgtingsmanna er løgtingslóg nr. 11 frá 8. januar 1993.

Formansskapur løgtingsins hevur í samráð við umboð fyri flokkarnar, ið ikki hava umboð í formansskapinum, samtykt, at yerast skal uppskot til broyting í verandi lóg um samsýning og eftirløn løgtingsmanna.

Viðmerkingar til hvørja einstøku greinarnar:

Ad § 1, nr. 1: Eftir galdandi reglum fær løgtingsformaðurin samsýning kr. 74.000 árliga. Grundgevingin fyri, at løgtingsformaðurin fær munandi hækkaða samsýning, er, at løgtingsformaðurin nú hevur størri ábyrgd og umfatandi arbeiði í útinningini av starvi sínum. Tað verður mett rímligt, at løgtingsformaðurin verður løntur í 39. lønarflokki. Tó fær løgtingsformaðurin ikki fundarpening, og er hetta ein avleiðing av, at virksemi hansara fevnir um arbeiðsdag alt tingárið í prinsippinum.

Ad § 1, nr. 2: Skotið verður upp, at formenninir í løgtingsnevndunum sbrt. §§ 25-26 fáa kr. 30.000 árliga. Eftir galdandi reglum fær fíggjarnevndarformaðurin kr. 74.000 árliga, og formenninir í fiskivinnunevndini og marknaðarnevndini kr. 50.000 árliga, t.v.s.at fíggjarnevndarformaðurin missir árliga kr. 44.000, og formenninir í fiskivinnunevndini og marknaðarnevndini missa hvør kr. 20.000 árliga. Um formenninir í løgtingsnevndunum sambært § 27 í tingskipanini verður skotið upp, at hesir fáa kr. 2.500 um mánaðin.

Ad § 1, nr. 3: Um nestformenn í løgtingsnevndum verður skotið upp, at teir fáa dupultan fundarpening, tá teir taka við eftir § 31 í tingskipanini.

Ad § 1, nr. 4: Av tí at farleiðin til arbeiðis hjá tingmonnum er ymisk, verður fundarpeningur at rokna eftir, hvussu long ferðatíð verður nýtt. Tó kann tíðin ongatið verða meira enn ein heilan dag.

Ein stórur partur av virksemi løgtingsins liggur nú í teimum sjey nevndunum, og skulu tær ásetingar í tingskipanini viðvíkjandi kap. II. Løgtingsnevndir fylgjast sum tilskilað, er neyðugt, at grundarlagið fyri hesum arbeiði er lagt vel til rættis, og at neyðugur peningur er játtaður á fíggjarlógini. Fyri 1996 er tí mælt til, at henda játtan verður økt við kr. 1,5 mió., og fer tingárið at vísa, hvussu bein hendan meting er.

Spurningurin um eftirløn verður viðgjordur. Um so er, at ein lýsing av ávísum tekniskum og fíggjarligum spurningum talar fyri eini broyting, verður skýða tikin til, um uppskot hesum viðvíkjandi verður lagt fram.

1. viðgerð 8. desember 1995. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 7. mai 1996 legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av formansskapi Føroya Løgtings tann 5. desember 1995 og varð eftir 1. viðgerð 8. desember 1995 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið á fleiri fundum. Undir viðgerðini hevur nevndin í tveimum umlorum hildið fund við formansskapin í løgtinginum.

Undir viðgerðini hevur verið roynt at fáa fulla undirtoku fyri uppskotinum ella at gera broytingar, sum øll nevndin kundi taka undir við. Men hetta hevur tíverri ikki eydnast og úrslitið er tí, at nevndin undir viðgerðini hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Vihelm Johannesen, Anfinn Kallsberg, Kristian Magnussen, Álvur Zachariasen og Tordur J. Niclasen) tekur undir við uppskotinum frá formansskapinum, men mælir til ávísar broytingar. Broytingarnar eru hesar:

1) § 1, nr. 1 verður orðað soleiðis:
"Ásetingin í lógarinnar § 1, stk. 1 fevnir ikki um løgtingsformannin, men verður hann løntur í 39. lønarflokki í tænastuntannalógini, tó fær løgtingsformaðurin ikki fundarpening."

2) Í § 1, nr. 2 verður orðið: "varaformenninir" broytt til: "næstformenninir".

3) § 1, nr. 3 verður orðað soleiðis:
"Næstformenninir í løgtingsnevndum fáa dupultan fundarpening, tá teir taka við sum formenn sambært Tingskipan Føroya Løgtings, tað sama er galdandi, tá teir virka sum skrivarar í nevndini."

4) Í § 1, nr 4 verður orðið "varaformenn" broytt til "næstformenn".

5) Í § 1, nr. 5 verður sett:
"§ 1, stk. 7 verður soljóðandi:
"Tá løgtingsmaður hevur fingið farloyvi sbr. reglunum í Tingskipan Føroya Løgtings verður løn hert veitt í farloyvistíðini, um løgtingsskrivstovustjórin fær:

a) læknaváttan um, at løgtingsmaðurin hevur verið sjúkur í farloyvistíðini,

b) avrit av ferðaloyvi frá løgtingsformanninum, sum sýnir, at løgtingsmaðurin verður ella hevur verið uttanlands í løgtingsørindum í farloyvistíðini.""

6) Í § 2, stk. 2 verður: "1. januar 1996" broytt til: "1. juni 1996".

7) Sum nýtt stk. 3 í § 2 verður sett:

"Allur tann danski teksturin verður strikaður."

Broytingarnar, sum meirilutin skjýtur upp eru m.a., at orðið "varaformenn í formansskapinum" verður broytt til "næstformenn". Orsøkin til broytingina er, at í tingskipanini verður orðið "næstformenn" nýtt um limirnar í formansskapinum.

Eisini verður mælt til at seta nýggja reglu í lógina um farloyvi hjá løgtingsmonnum. Fíggjarnevndin er vitandi um, at tingskipanarnevndin, sum viðger tingskipanina, hevur strikað farloyvisreglurnar í tingskipanini við teirri grundgeving, at hesar reglur hoyra heima í lógini um samsýning og eftirløn løgtingsmanna.

Meirilutin tekur undir við, at næstformenninir í løgtingsnevndum fáa dupultan fundarpening, tá teir taka við sum formenn samb. Tingskipan Føroya Løgtings, men umframt hetta mælir meirilutin til, at næstformenninir eisini fáa dupultan fundarpening, tá teir sambært tingskipanina virka sum skrivarar í nevndini.

Somuleiðis verður mælt til, at ígildisseting lógarinnar samb. § 2 verður broytt soleiðis, at broytingin viðv. samsýning til fíggjarnevndarformannin fær gildi frá 1. juni 1996 ístaðin fyri 1. januar 1996, sum formansskapurin hevur skotið upp. Tá talan er um at skerja samsýningina, heldur nevndin tað ikki vera rætt, at tað verður gjørt við afturvirkandi megi.

Minnilutin í nevndini (Finnbogi Ísakson og Finnbogi Arge) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

2. viðgerð 9. mai 1996. Broytingaruppskot meirihlutans til §§ 1 og 2 vórðu samtykt við 20-3-0 atkvøðum. Samtykt við 20-2-1 atkvøðum at beina málið soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 14. mai 1996. Málið endaliga samtykt við 24-4-1 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 53. 20. mai 1996.

20 Broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap

Ár 1995, tysdagin 5. desember legði Ivan Johannesen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 5, stk. 4 verður orðað soleiðis:

"**Stk. 4. Fiskiloyvi** sambært hesi lóg er tann rattur, sum Føroya Landsstýri hevur latið eigara av ávísum fiskifari, sum hevur veiðiloyvi sambært stk. 3, at veiða ávísa nøgd úr fiskastovnum á ávísum leiðum í ávísum fiskiári. Fiskiloyvi kann eisini verða latið eigara av fiskifari, sum uttan at hava fingið veiðiloyvi sambært stk. 3, fær fyribils ella avmarkaði rættindir at veiða ávísa nøgd úr fiskastovnum á ávísum leiðum í ávísum fiskiári."

2) Í § 6 verður orðingin "veiðiloyvi" strikað.

3) § 8, stk. 3 verður orðað soleiðis:

"**Stk. 3.** Veiðiloyvi frá fiskifari, ið er lagt undir alla, har ræðisavmarking er skrásett í skipaskránni, ella fiskið er strikað í skipaskránni, kann verða flutt til innflutt fiskifar við sama ella minni orku. Er talan um veiðiloyvi til pelagisk fiskasløg ella rækjuveiðu kann landsstýrið gera undantøk frá hesum kravi."

4) § 27 verður orðað soleiðis:

"**§ 27.** Heildarkvotur á landleiðunum fyri fiskifør undir føroyskum flaggi verða ásettar fyri hesar fiskastovnar frá 1. september 1995 til 31. august 1996

Tons rund vekt:

Toskur á Føroya Banka	500
Toskur á landgrunninum	17.000
Hýsa	10.000
Upsi	39.000
Kongaliskur	10.000

§ 2.

Henda lóg fer gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar:

Samsvarandi § 22 í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap við seinni broytingum vórðu heildarkvoturnar fyri fiskiárið 1. september 1995 til 31. august 1996 ásettar við løgtingslóg nr. 124 frá 8. august 1995.

Tá landsstýrið legði fram uppskot um áseting av heildarkvotu inniverandi fiskiár, løgtingsmál nr. 2/1995, var sagt frá, at landsstýrið fór at biðja Fiskirannsóknarstovnin og Stovnsroktarnevndina um at endurskoða sínar tilmæli í seinasta lagi í mars 1996. Landsstýrið hevur biðið um nýtt tilmæli, sum eru komin 19. og 20. november 1995. Landsstýrið hevði eisini biðið ICES (ACFM- arbeiðsbólkin) endurskoðað sína niðgeving, eftir at frágreiðingin frá kanadiska fiskifrøðinginum Jean-Jacques Maguire var latin Fiskirannsóknarstovnin og ICES.

Tilmælini frá Fiskirannsóknarstovuni og Stovnsrøktarnevndini eru hjálogd hesum máli sum fylgiskjøl, men landsstýrið heldur ikki, at ICES hevur viðgjørt málið av nýggjum á ein slíkan hátt, at hetta kann leggjast til grund fyri einum nýggjum tilmæli.

Fiskirannsóknarstovan er komin fram til, at lívfroðiligu fortreytirnar undir stovnsmetingunum í mai 1995 eru broyttar, og at hetta gevur grundarlag fyri at broyta ásetanina av mest loyvdu veiðu í inniverandi fiskiári. Fiskirannsóknarstovan mælir til at broyta mest loyvdu veiðu kvotuárið 1995/96, soleiðis at toskurin á landgrunninum verður hækkaður frá 10.000 tons til 17.000 tons, og at mest loyvda veiða av upsa verður lækkað frá 39.000 tons til 26.000 tons. Fyri tosk á Føroya Banka, hýsu og kongafisk verður ikki mælt til broytingar.

Stovnsrøktarnevndin hevur endurskoðað síni tilmæli, og mælir til hesar broytingar í mun til tilmælið, ið varð latið landsstýrinum í juli 1995 um mest loyvdu veiðu fyri kvotuárið 1995/96: Toskur á landgrunninum verður hækkaður frá 19.500 tons til 20.000 tons, toskur á Føroya Banka verður lækkaður frá 1.400 tons til 500 tons, hýsan verður lækkað frá 14.300 tons til 10.000 tons, upsin verður hækkaður frá 37.500 tons til 38.000 tons og kongafiskur verður lækkaður frá 13.500 tons til 10.000 tons.

Út frá hesum tilmælum má landsstýrið ásanna, at stovnsmetingarnar í ár vísa, at stoðan í toska- og hýsustovninum er batnað nakað, og at tilgongdin av toski frá gýtingini í 1993 eisini er hampulig, men at í longdini eigur árligi fiskiskapurin at liggja millum 15 og 25%, um stovnurin skal verða í tryggari legu. Landsstýrið heldur, at veiðitrýstið eftir toski og upsa eigur at vera í mesta lagi 25% av stovninum, og at hetta verður gjørt í tveimum stigum. Eftir hesum kann mest loyvda veiða av toski vera 17.000 tons, sum er grundað á sama veiðitrýst sum í 1994, meðan hýsukvotan verður óbroytt.

Fyri upsan er tað sama galdandi sum fyri toskin, og at við sama veiðitrýsti sum í 1994 skuldi fiskiskapurin verið 25% í tveimum stigum. Landsstýrið heldur tó, at hetta kann ikki gerast í inniverandi kvotuárið, tá kvotur eru býttar út og fiskiskapurin lagdur til rættis eftir hesum.

Fyri kongafisk eigur veiðan at vera sum ásett í hesum kvotuári. Toskur á Føroya Banka eigur frambaldandi at vera avmarkaður, og eigur ásetta kvotan at vera óbroytt.

Fiskivinnu Starvsnevndin hevur tann 27. november 1995 viðgjørt málið og mælir landsstýrinum til í fyrstu atløgu at fylgja tilmælinum frá Stovnsrøktarnevndini um mest loyvdu veiðu av toski at vera 20.000 tons og av upsa at vera 38.000 tons.

Landsstýrið leggur í sínum uppskoti dent á at tryggja, at gýtingarstovnurin veksur aftur, og tann óvissa, sum altíð vil vera í fiskiskapi, verður so lítil sum gjørligt og at endamálsorðingin í lógini at varðveita tilfeingið og at troyta og gagnnýta hetta burðardygt á skilabesta hátt, lívfroðiliga og búskaparliga, við virðing fyri sambandinum millum ymisku dýra- og plantustovnarnar í havinum og meingi teirra, til tess at tryggja besta samfelagsbúskaparliga íkastið frá fiskivinnum, støðugar arbeiðs- og inntøkumøguleikar og møguleikar fyri vinnuligum virksemi um alt landið, verður fylgt. Ásannast má, at náttúran seinastu 2 árini hevur verið til vildar, og at tann økta tilgongdin av toski og hýsu, sum má til, fyri at stovnarnir kunnu vaksa, er komin. Náttúran hevur gjørt sín part, og nú er takið at bera so í bandi, at stovnarnir fáa møguleika at vaksa og veiðan kemur í eina trygga legu.

Viðmerkingar til einstøku broytingarnar:

ad. 1). Landsstýrið miðjar ímóti, at teir, sum reka vinnuligan fiskiskap, eiga ávís kvoturættindir eisini á fjarleiðum, hava eitt veiðiloyvi, meðan aðrir, sum partvíst reka vinnuligan fiskiskap, ella sum ikki hava veiðiloyvi til ávís økir, kunnu fáa eitt tíðaravmarkað fiskiloyvi, sum kann verða nýtt, tá smærri nogdir skulu avreiðast, ella tá skip fáa loyvi at veiða únýttar kvotur á fjarleiðum í einum fiskiári.

ad. 2). Víst verður til broytingina undir 1), og verður tí bert fiskiloyvi kravt fyri at avreiða.

ad. 3). Samsvarandi § 31 í lógini er talið av veiðiloyvum, sum fáa egna kvotu ella felagskvotu í hvørjum bólki av fiskiførum undir føroyskum flaggi, tað talið, sum varð útskrivað frá landsstýrinum til fiskifør 20 BRT ella meira í 1993. Soleiðis sum § 8, stk. 3 er orðað og galdandi fyri allan veiðiflotan, so merkir tað,

at skip, sum verður innflutt fyri annað skip, sum hevur veiðirettindi og kvotu á føroyska landleiðunum ella á fjarleiðum, bert kann inntlytast og fáa veiðirettindini yvirflutt, um innflutta skipið er yngri enn 10 ár og ikki hevur størri veiðiorku enn tað skipið, sum fer úr veiðiflotanum. Rækjuskip, og skip, sum veiða pelagisk fiskaslog, ella bert hava veiðirettindir á fjarleiðum, kunnu ikki fara út fyri betri og størri skip. Landsstýrið eigur at hava eina heimild at gera undantøk í slíkum fari, serstakliga um talan er um nótaskip, rækjuskip og skip á fjarleiðum. Tekniskar reglur galda, tá eldri skip verða flutt inn frá útlandinum. Hovuðsreglan er, at tey skulu lúka tey krøv, sum vórðu sett, tá tey vóru nýggj og onnur skipaeftirlitskrøv komin í gildi síðani. Skipum eldri enn 15 ár verða slík krøv sett, sum forða fyri, at hesi koma í veiðiflotan uttan størri umvælingar ella umbyggingar.

ad. 4). Vísur verður til høvuðsviðmerkingarnar.

1. viðgerð 7. december 1995. Málið verð beint í vinnunevndina, sum 11. december 1995 legði fram soljóðandi

Á 111

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 5. december 1995 og eftir 1. viðgerð 7. december beint í vinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og mælir til nakrar broytingar. Til pkt. 1 hevur nevndin hesa viðmerking: Av tí at so stutt tíð er til viðgerðina, kann nevndin ikki sígggja fyrimunirnar og vansarnar, ið liggja í hesari broyting, serliga við atliti til økt veiðitrýst á Føroyagrunninum. Nevndin mælir tí til, at punkt 1 verður kannað nærri inntil uppskotið kemur aftur á tingborð seinri.

Sama er galdandi fyri punkt 2 í uppskoti landsstýrisins.
Viðmerking til nr. 3): Nevndin er samd um, at higartil er tað, sum avreitt er av bátum, sum reka partvísan út róður, farið av kvotuni í bólki 6 til úróðrarbátar undir 20 tons, tí skjýtur nevndin upp, at áðrenn tað regluliga býtið fer fram, verða avsett 400 tons av toski av landleiðini, sum skulu mótroknast til stóra tali av útróðrarbátum, sum einans avreiða smáar nøgdir.

Tí setir ein samd nevnd fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

§ 1.

Í § 1 í uppskoti landsstýrisins verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 1, punkt 1 og 2 verða strikað og punkt 3 og 4 verða punkt 1 og 2.
2) Í punkt 2 verða gjørdar hesar broytingar:
"Toskur á landgrunninum 18.500
hýsa 12.000
kongafiskur 11.000."
3) Í § 28 sum nýtt stk. 2 verður sett: "Áðrenn felags kvotupartarnir verða roknaðir, verða frábýtt 400 tons av toski av landgrunninum at nýta í bólki 6 til bátar, sum partvís reka útróður og avreiða smærri nøgdir."
Stk. 2 og 3 verða stk. 3 og 4.

Nevndin hevur fingið brev frá felagnum Snefluskip um at fáa frábýtta kvotu í bólki 4. Nevndin heldur ikki at tað letur seg gera at býta frá í einum kvotuári. Skal hetta gerast, eigur tað at verða gjort við byrjan av einum kvotuári.

Eftirsum landsstýrið saman við vinnumi hevur sett nevnd at arbeiða við ollum kvotamálinum, mælir vinna-

nevndin til, at spurningurin um frábýti í bólki 4 verður tikin uppaftur, tá úrslitið hjá hesi nevnd fyriliggur.

Eisini hevur nevndin fingið bræv frá felagnum Trolbátar (á landl.). Nevndin skjýtur upp, at trupulleikin hjá trolbátunum verður viðgjørdur eftir, at nevndin, sum arbeiðir við øllum kvotaspurninginum er liðug við arbeiði sítt. Hetta við serligum atliti til, um kvotan í bólki 4 verður býtt út á tað einstaka fiskifarið.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Ein minniluti (John Petersen og Jákup Olsen) førir fram, at eftirsum nevndin, ið er niðursett at viðgera spurningin, um vit skulu hava tekniskar reguleringar framyvir ikki er liðug við sítt tilmæli, verður tikið undir við meirilutanum í teimum broytingum, ið gjørdar verða í kvotulógini.

Minnilutin er greiður yvir, at flotin ikki kann liggja bundin við bryggju, og eru hesar broytingar tí neyðugar. Líka nmeyðugt er, at so skjótt reguleringsnevndin er liðug við sítt tilmæli, eigur hetta at leggjast fyri tingið, sø vit ikki aftur standa við somu trupulleikum um 2 - 3 mánaðar.

Ein minniluti (Heini O. Heinesen) førir fram:

Soleiðis sum lógin um vinnuligan fiskiskap hevur verið umsitin seinasta árið, er lógin meira til skaða enn gagn fyri fiskastovnin á landleiðini.

Ja, vit kunnu gott siga, at umsitingin av lógini er við at gerast ein hóttan í móti fiskastovnunum á føroysku landleiðini.

Tað, sum serliga ger meg ivasaman, er, at kvotan verður broytt upp og niður sum best ber til.

Sum dømi kunnu vit taka toskakvotuna, sum varð hækkað 1. juni í ár við 4.000 t., 6 vikur seinni setir samgongan og sama landsstýrið kvotuna til 10.000 tons.

Sama landsstýrið hevur nú uppskot um at hækka kvotuna 17.000 tons.

Hetta er so ørkymlandi fiskivinnupolitikkur, at tað var betri, um landsstýrið avtók kvotulógina, um hetta skal halda fram.

Minnilutin (Heini O. Heinesen) hevur størri álit á trolfrítum leiðum, herundir tekniskum reguleringum, so sum fiskidagatali v.m.

Tað, sum hevur størsta týdning í fiskivinnupolitikki okkara má vera: At støddi og samanseting veiðiflotans verður lagað eftir, hvat fiskastovnarnir tola.

Tað er tí av allarstørsta týdningi, at politikararnir tora at siga, hvussu flotin skal verða sammansettur.

Í lógini um vinnuligan fiskiskap er eitt býti. Meiningin við hesum býti er, at teir veikaru veiðihættirnir skuldu hava sama møguleika, sum áðrenn lógin kom í gildi. Her varð serliga hugsað um snellu- og línufiskiskap.

Á ólavsøku kom nýggj stýrisskipan í gildi. Hetta merkir, at kunngerðir og reguleringar viðvíkjandi fiskiskapi á føroysku landleiðunum ikki verða lagdar fyri løgtingsins fiski-
vinnunevnd (nú vinnunevndin) til góðkenningar.

Annars verður víst til álit í løgtingsmáli nr. 91/94 við sama uppskoti frá 4 tingmonnum. Út frá hesum viðmerkingum loyvir minnilutin (Heini O. Heinesen) sær at skjóta upp, at kunngerð nr. 3 frá 6. januar 1994 verður sett inn í lógina:

Tí verður sett fram soljóðandi

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap

§ 1. Í løgtingslóg nr. 28 frá 10 mars 1994 um vinnuligan fiskiskap verður sett sum nýtt stk. 4 í § 9.

Veiða við troli v.m.

Leiðir:

§ 1. Veiða við skovlváð, troli, snurriváð ella líknandi neti er ikki loyvt í teinum tilskilaðu tíðarskeiðunum og leiðunum:

Alt árið innanfyri linjur drignar 12 fjórðingar frá grundlinjunum. Frá forboðnum eru tó tey fiskifor undantikin, ið hava serloyvi til troling og royndir, sum Fiskirannsóknarstovan skipar fyri.

a) Í tíðarskeiðinum 1. januar til 31. desember, báðir dagar íroknaðir, á Føroya Banka innanfyri linjur drignar millum hesi 7 støðini og í hesi raðfylgju:
   1. 60°50'00"N 07°57'00"V
   2. 61°03'00"N 07°57'00"V
   3. 61°15'30"N 08°16'00"V
   4. 61°13'20"N 08°42'12"V
   5. 61°00'00"N 09°11'00"V
   6. 60°48'40"N 09°25'00"V
   7. 60°24'00"N 09°07'00"V

   tó soleiðis, at í tíðarskeiðinum frá 1. september til 31. mai, báðir dagar íroknaðir, er loyvt at veiða innanfyri linjur drignar millum hesi støð:
   1. 60°50'00"N 07°57'00"V
   2. 60°57'20"N 07°57'00"V
   3. 60°45'40"N 08°37'00"V
   4. 60°36'30"N 08°45'00"V
   5. 60°26'00"N 09°08'25"V
   6. 60°24'00"N 09°07'00"V

   Hetta veiðubann fevnir ikki um beinleiðis veiði eftir sild og makreli við kraftblokki.

b) Í tíðarskeiðinum frá 20. januar til 1. mars, báðir dagar íroknaðir, innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi raðfylgju:
   1. 61°10'00"N 09°35'00"V
   2. 61°35'00"N 09°35'00"V
   3. 61°35'00"N 09°20'00"V
   4. 61°28'00"N 09°20'00"V
   5. 61°10'00"N 09°28'00"V

c) Alt árið 12 fjórðingum úr grundlinjunum og innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi raðfylgju:
   1. 61°44'48"N 07°43'18"V
   2. 61°32'48"N 08°20'30"V.
   3. 61°49'00"N 08°41'48"V
   4. 61°57'00"N 08°16'30"V.
   5. 61°57'00"N 07°59'30"V.

d) Alt árið 12 fjórðingum úr grundlinjuni og innanfyri linjur drignar millum hesi støðini og í hesi raðfylgju:
   1. 62°26'05"N 07°30'00"V
   2. 62°30'00"N 07°30'00"V
   3. 62°30'00"N 08°00'00"V
   4. 62°35'00"N 08°00'00"V
   5. 62°47'00"N 07°12'05"V
   6. 62°47'00"N 06°30'00"V
   7. 62°35'00"N 06°30'00"V

e) Í tíðarskeiðinum frá 1. apríl til 31. januar, báðir dagar íroknaðir, 12 fjórðingar úr grundlinjunum og innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi raðfylgju:
   1. 62°25'00"N 05°52'00"V
   2. 62°25'00"N 05°16'00"V
   3. 62°03'00"N 05°18'00"V
   4. 62°03'00"N 05°50'00"V
   5. 62°00'00"N 05°50'00"V
   6. 62°00'00"N 05°57'05"V

f) Alt árið 12 fjórðingar úr grundlinjunum og innan fyri linjur drignar millum hesi støðini og í hesi raðfylgju:
   1. 61°12'00"N 06°22'00"V
   2. 61°00'00"N 06°22'00"V
   3. 60°56'00"N 06°09'00"V
   4. 60°45'00"N 06°13'00"V
   5. 60°45'00"N 06°36'00"V
   6. 61°27'00"N 07°30'00"V
   7. 61°32'30"N 07°27'00"V

g) Alt árið 12 fjórðingar úr grundlinjunum og innan fyri linjur drignar millum hesi støðini og í hesi raðfylgju:
   1. 61°37'00"N 07°33'00"V
   2. 61°30'00"N 07°45'00"V
   3. 61°26'00"N 07°45'00"V
   4. 61°26'48"N 07°49'12"V
   5. 61°27'18"N 08°14'00"V
   6. 61°29'00"N 08°10'00"V
   7. 61°30'30"N 08°13'00"V
   8. 61°34'30"N 08°15'00"V
   9. 61°36'00"N 08°10'00"V
   10. 61°31'30"N 07°56'00"V
   11. 61°41'00"N 07°38'30"V

h) Í tíðarskeiðinum frá 1. januar til 31. desember báðir dagar íroknaðir, millum 12 og 19 fjórðingar frá grundlinjuni millum breiddarstigið 61o57'00"N og 315° rætivísandi úr Barðinum 62°08'48"N 07°26'00"V 1.

i) Í tíðarskeiðinum frá 1. januar til 31. desember báðir dagar íroknaðir, millum 12 og 19 fjórð-

ingar frá grundlinjunum millum 315° rettvísandi úr Bardinum (62°08'48"N 07°26'00"V) og innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi raðfylgju:

1. 62°30'00"N 07°45'00"V
2. 62°30'00"N 07°30'00"V
3. 62°26'05"N 07°30'00"V

fyri fiskifør við maskinorku uppá 500 HK ella yvir, tó so at hestamegin fyri hvørt nýtt trol ikki fer upp um 500 HK.

j) Í tíðarskeiðinum frá 1. januar til 31. desember báðir dagar íroknaðir, millum 12 og 16 fjórðingar frá grundlinjunum og millum longdarstigið 06°30'00"V og breiddarstigið 62°25'00"N fyri fiskifør við maskinorku uppá 500 HK ella yvir, tó so at hestamegin fyri hvørt nýtt trol ikki fer upp um 500 HK.

k) Í tíðarskeiðinum frá 1. januar til 31. desember báðir dagar íroknaðir, innanfyri linjur drignar millum hesi stødini og í hesi raðfylgju:

1. 60°51'00"N 06°04'00"V
2. 60°51'00"N 06°04'00"V
3. 60°51'00"N 05°56'00"V
4. 60°51'00"N 05°56'00"V

+ semja 4.jan.1994.
+ 2 kort.

l) Í tíðarskeiðinum frá 1. januar til 31. desember, báðir dagar íroknaðir, innanfyri linjur drignar millum hesi stødini og í hesi raðfylgju:

1. 60°26'00"N 06°32'00"V
2. 60°35'00"N 06°35'00"V
3. 60°35'00"N 06°09'00"V
4. 60°26'00"N 06°10'00"V.

Semja

Undirritaðu felagsskapir eru samdir um at gera hesar broytingar í ikki lýstu kunngerðini nr. 201 um broyting í kunngerð um fiskiskapin á landleiðunum við fiskiførum, sum eru skráset í Føroyum.

1. Kalvakassin B verður minkaður nakað vestureftir, fyri at djúpvatnstrolarar fáa rovm eftir 350 fv.

2. Kassi C broyttur í semju millum trol og lúk og ídnaðarveiðu fyri at geva fregastu ræsir fyri hvørjum øðrum.

3. Kassi D broyttur soleiðis, at norðasta linjan gongur eftir 62 gradir og 47 minuttir el um 250 fv. dýpi fyri at bæði snella og trol (djúpa vatnið) fáa sínar leiðir.

4. Kassi E eystan fyri opin tíðarskeið 1. februar til 30. mars vegna upsaveiðuna við tr og sunnari kantur broyttur 3 fj. longur norður vestur til Oyragrynnuna vegna trol- og ídnaðarveiðuna. Henda broyting er mótvegis Skeiva Banka (pkt. 6).

5. Kassi F víðkaður allan vestara kanun til eisini at fevna um gamla kassa G til fess at veita rúmari ræstur hjá línuveiðuni.

6. Allur Skeivi Banki stongdur vegna snelluveiðu aftanfyri tað, sum er latið av kassa í ídnaðarveiðan fer somu leiðir vestanfyri hóast hetta.

Vit mæla tí Føroya Landsstýri og Fiskivinnunevnd Føroya Løgtings til, at tjálagda uppskot kunngerð verður sett óbroytt í verk.

Undirritaðu feløg eru samd um at mótmæla, at kvotuskipan verður sett í verk.

Tórshavn 4. jan. 1994.

Megintfelag Útróðrarmanna
Bjarni Vestergaard (sign.)

Felagið Snelluskip
Felagið Línuskip
Á. Dam (sign.)

Felagið Ídnaðarskip
J. Christiansen (sign.)

Felagið Trolskip
E. Nolsøe (sign.)

2. viðgerð 18. desember 1995. Uppskot um at heina málið aftur í nevnd fall við 10-3-11 atkvøðum. Uppskot landsstýrisins við broyting frá meirilutanum í vinnunevndini samtykt við 21-4-0 atkvøðum. Uppskot minnilutans (Heini O. Heinesen) samtykt við 14-0-11 atkvøðum.

3. viðgerð 22. desember 1995. Uppskot minnilutans varð aftartikið. Uppskot landsstýrisins sum broytt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 28-3-0 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 174 frá 22. desember 1995.

F.L.j.nr. 1501-1/94.

21 Lóg um heildarveiting til Føroyar

Ár 1995, týsdagin 5. desember legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður legði fram soljóðandi

Uppskot

til

ríkislógartilmæli.

Hennara hátign drotningini verður mælt til, aftaná samtykt í Fólkatinginum, at seta lóg í gildi fyri Føroyar við hesum orðaljóði:

Lóg um heildarveiting til Føroyska Heimastýrið í árunum 1996-1998.

§ 1. Ríkið letur í 1996, 1997 og 1998 eina árliga heildarveiting uppá 860,3 mió. kr. til Føroyska Heimastýrið.

§ 2. Heildarveitingin verður í 1997 og 1998 javnað við einum prosenti, sum svarar til miðal prís- og lønarútjavningina á rakstrarfíggjarlóg ríkisins fyri nevndu ár.

§ 3. Heildarveitingin verður útgoldin hvønn mánað sum forskot og í eins stórum gjøldum, um ikki annar gjaldsháttur verður avtalaður millum fíggjarmálaharran og Føroyska Heimastýrið.

§ 4. Henda lóg kemur í gildi tann 1. januar 1996.

Det indstilles til hendes majestæt dronningen, efter samtykke i Folketinget, at sætte loven i kraft for Færøerne i følgende skikkelse:

Lov om tilskud til Færøernes Hjemmestyre for årene 1996-1998.

§ 1. Staten yder i 1996, 1997 og 1998 et årligt tilskud på 860,3 mill. kr. til Færøernes Hjemmestyre.

§ 2. Tilskuddet reguleres i 1997 og 1998 med en procent, der svarer til den gennemsnitlige pris- og lønregulering på statens driftsbudget for det pågældende år.

§ 3. Tilskuddet udbetales forskudsvis i lige store rater hver måned, medmindre der træffes anden aftale om udbetalingsterminer mellem finansministeren og Færøernes Hjemmestyre.

§ 4. Denne lov træder i kraft den 1. januar 1996.

Viðmerkingar:

Sambært felagslýsingini frá fundi 3. november 1995 millum donsku stjórnina og landsstýrið verður ríkisstuðulin 860,3 mió. kr. í 1996. Ríkisstuðulin verður í 1997 og 1998 hækkaður við meðal prís- og lønarhækkingini á rakstrarútreiðslunum á danska fíggjarlógaruppskotinum.

Danska stjórnin og landsstýrið eru samd um at seta ein arbeiðsbólk, sum í seinasta lagi í 1997 skal hava gjørt uppskot til hvørji viðurskifti skulu havast í huga sum grundarlag undir samráðingunum um heildarveitingina í árunum aftaná 1998.

Hjáløgd fólkatingslógaruppskotið við viðmerkingum og felagsyvirlýsingin.

1. viðgerð 7. desember 1995. Málið varð beint beinleiðis til 2. viðgerð.

2. viðgerð 12. desember 1995. Samtykt at beina málið til 3. viðgerð við 20-1-0 atkvøðum. Loyvi varð givið til at víkja frá tíðarfreistini við 17-4-0 atkvøðum.

3. viðgerð 13. desember 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 16-3-0 atkvøðum.

FL jnr. 2503-5/93.

22 Broyting í løgtingslóg um ferðslu

Ár 1995, mánadagin 11. desember legði Axel Nolsøe, landsstýrismaður, vegna Sámal Petur í Grund, landsstýrismann, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 65 frá 9. september 1963 um ferðslu við seinri broytingum, verða gjørdar hesar broytingar:

Í § 18 b verða gjørdar hesar broytingar:

1) Sum nýggj stk 5 og stk 6 í § 18 b verða sett:

"Stk 5. Landsstýrið ásetur reglur um umbýti av koyrikorti."

"Stk 6. Landsstýrið ásetur reglur um gjald fyri umbýti av koyrikorti."

Viðmerkingar:

Á fundi 7. februar 1995 samtykti landsstýrið, at umsitingin av motorskrá og koyrikortum verður flutt frá Landfútunum til Bileftirlitið pr. 1. januar 1996. Eisini samtykti landsstýrið at leggja fyri løgtingið lógaruppskot um tvungið umbýti av koyri kortum í 1996 og 1997.

Higartil galdandi koyrikortini fara úr gildi, og nýggj koma í staðin, sum hava sama form sum credit-cards. Tey eru gjørd í EU-sniði og geva full rættindi til at koyra akfar í EU-londum.

Miðað verður eftir, at gjøldini sum koma inn eftir § 18 b, stk. 5, eru á hædd við útreiðslurnar, sum standast av umleggingini. Skipanin skuldi sostatt verið útreiðsluneutral fyri landskassan.

1. viðgerð 14. desember 1995. Málið varð beint í mentanarnevndina, sum 20. desember 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 11. december 1995 og eftir 1. viðgerð 14. december 1995 beint í mentanarnevndina.

Nevndin hevur á fundi tann 18. december 1995 viðgjørt málið og hevur í hesum sambandi innkallað landsstýrismannin, Sámal Petur í Grund, til fundar í nevndini.

Til viðgerðar var løgtingsmál nr. 22/1995: Broyting í løgtingslóg um ferðslu.

Nevndin hevði tveir spurningar til landsstýrismannin:
1) Hvør er orsøkin til, at umsitingin av motorskrá og koyrikortum verður flutt frá landfótanum til Bileftirlitið 1. januar 1996 ?
   og
2) Kann nýggja koyrikortið nýtast eisini uttan fyri ES ?

Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður, svaraði spurningunum soleiðis:

Viðvíkjandi 1): Føroya Landsstýri hevur havt ynski um, at nevnda umsiting verður flutt til Bileftirlitið, og hevur sostatt á fundi 7. februar 1995 samtykt, at flytingin skuldi fara fram 1. januar 1996.

Viðvíkjandi 2): Landsstýrismaðurin upplýsti, at talan var framhaldandi um eitt føroyskt koyrikort, tó soleiðis, at nýggja koyrikortið verður eitt altjóða koyrikort. Koyrikortið kann soleiðis nýtast eisini uttan fyri ES, og er ikki eitt ES-koyrikort, tó at tað gevur okkum rætt til at koyra akfar í ES-londum.

Nevndin var eisini samd um, at "EU" í viðmerkingunum til uppskot landsstýrisins eigur at verða broytt til "ES" vísandi til føroyskan málburð.

Ein samd nevnd tekur undir við uppskoti landsstýrisins, tó soleiðis at nevndin settir inn § 2 í uppskot landsstýrisins soljóðandi: "Lógin kemur í gildi 1. januar 1996." Hetta er tí, at greinin við ígildissetan av lógini vantaði í uppskoti landsstýrisins.

Samsvarandi omanfyristandandi mælir ein samd nevnd tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins við nevndu broyting og setir tí fram soljóðandi

broytingaruppskot

til

<u>uppskot landsstýrisins</u>

Sum nýggj § 2 verður sett:
"§ 2. Lógin kemur í gildi 1. januar 1996."

2. viðgerð 21. desember 1995. Uppskot landsstýrisins við broyting frá sundarí mentanarnevnd samtykt við 17-0-0 atkvøðum.

3. viðgerð 22. desember 1995. Uppskotið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 31-0-0 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 2 frá 9. januar 1996.

FL. j.nr. 640-3/90.

23 Løgtingslóg um lán til Arbeiðsloysistryggingina og Arbeiðsávísingina

Ár 1995, mánadagin 11. desember legði Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður, vegna Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um lán til Arbeiðsloysistryggingina og Arbeiðsávísingina.

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veita Arbeiðsloysistryggingini og Arbeiðsávísingini upp til 75 mió. kr. í láni.
Stk. 2. Landsstýrið fær heimild til at áseta nærri reglur fyri afturgjalding av láninum.
§ 2. Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjord.

Viðmerkingar:

Á vári 1993 var Arbeiðsloysistryggingin og Arbeiðsávísingin í fíggjarligum trupulleikum. Til tess at bøta um hesi lænti Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin Arbeiðsloysistryggingini og Arbeiðsávísingini tað av fæi grunsins, sum tann 1. apríl 1992 var yvir 2 mill. kr. Henda upphædd var 51,7 mill. kr., og varð hon veitt við landskassaveðhaldi.

Rentan varð sett til 5% p.a., og varð helvtin sett til afturgjaldingar 1. apríl 1995 og hin til 1. apríl 1996.

Somuleiðis skuldi inngjaldið til Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin fatast Arbeiðsloysistryggingini og Arbeiðsávísingini í tíðarskeiðnum frá 1. apríl 1993 til 31. mars 1994.

Hetta var alt sambært løgtingslóg nr. 68 frá 2. apríl 1993.

Sambært løgtingslóg nr. 21 frá 4. mars 1994 varð ásett, at gjaldið til Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin í tíðarskeiðnum frá 31. mars til 30. juni 1994 varð latið Arbeiðsloysistryggingini og Arbeiðsávísingini sum eitt lán við eini rentu uppá 5% p.a. Henda upphædd, sum verður uml. 12 mill. kr. hevur ikki landskassaveðhald.

Samstundis var samlaða afturgjaldingin broytt til, at ein helvt skuldi gjaldast 1. apríl 1996 og hin helvtin 1. apríl 1997.

Sambært løgtinslóg nr. 114 frá 25. november 1994 um broyting í løtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing § 1, 3), er samlaða aftur gjaldingin broytt til, at alt lánia skal gjaldast aftur 1. apríl 1997.

Samlaða lánsupphæddin við rentum er nú til góðar 72 mill. kr. mill. kr.

Landsstýrið metir, at neyðugt er hjá Arbeiðsloysistryggingini og Arbeiðsávísingini at fáa eina meira lagaliga afturgjaldsskipan, so avdráttir og rentur ikki koma at taka fíggjarliga støðið undan skipanini.

Tískil er neyðugt við eini avdráttarskipan, sum Arbeiðsloysistryggingin og Arbeiðsávísingin er ment at bera, og sum ikki ávirkar virkismøguleikarnar hjá Arbeiðsloysistryggingini og Arbeiðsávísingini meira enn neyðugt.

Fleiri møguleikar hava verið viðgjørdir, men mett verður, at hetta uppskotið, um at landsstýrið fær heimild at veita lán, er frægasta loysnin.

Lánið verður latið eftir marknaðartreytum.

Til samanberingar kann sigast, at lánið úr landskassanum til Húsalánsgrunnin sambæt løgtingslóg nr. 28 frá 14. februar 1995 verður skuldin avdrigin yvir 15 ár við hálvárligum avdrátturn, sum verða goldin hvønn 11. juni og 11. desember, fyrstu ferð 11. juni ár 2000.

Skuldin verður rentað frá útgjaldingardegnum við teirri til hvørja tíð galdandi rentusatsi fyri hetta lánið, sum Føroya Landsstýri ásetir. Skuldin verður rentað við í lotuni 7% p.a. av tí til hvørja tíð verandi skuld.

Rentan verður goldin hálvárliga 11. juni og 11. desember fyri tað tá farna tíðarskeiðið, fyrstu ferð 11. juni 1995.

1. viðgerð 14. desember 1995. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 30. januar 1996 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 11. december 1995 og eftir 1. viðgerð tann 14. december 1995 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið. Undir viðgerðini hevur nevndin hitlið fund við landsstýrismentirnar Jóannes Eidesgaard og Axel Nolsøe, Landsbankastjóran, og umboðum fyri Fíggjar- og búskapardeildina og Almanna- og Heilsudeildina.

Nevndin setti fram spurningin um, hví tað er neyðugt at innfría lánið til ALS nú, og hvørjir teir fleiri møguleikarnir, ið vist verður á í viðmerkingunum eru. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum Jóannes Eidesgaard svaraði, at sambæt lánsavtaluni fellur alt lánið til gjaldingar 1. apríl 1997, og kann hetta gerast sera tyngjandi fyri ALS. Eisini byrjar Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin at gjalda út í 1997, og fyri at hesin grunnur ikki skal verða kvaldur í føðingini, er hetta frægasta loysnin.

Nevndin spurdi, um hædd var tikið fyri, hvussu eitt lán úr landskassanum til ALS vil ávirka halli á fíggjarlógini. Til hetta varð svarað, at lánið ikki vil hekkað um skyldurnar hjá landskassanum, tí landskassin verðheldur fyri 70 % av láninum frá Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum til ALS.

Aftaná hesa frágreiðing, fenir ein samd nevnd fram, at hon ikki kann taka undir við uppskotinum hjá Landsstýrinum. Grundgevingin fyri hesum er, at lánið, sum ALS hevur frá Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum ikki fellur til gjaldingar fyrr enn 1. apríl 1997, og tí hevur Landsstýrið góða tíð at finna og viðgerða aðrar loysnir. Ein loysn er, at lánið frá Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum verður standandi hjá ALS, men at avtala verður gjørd um rentu og avdráttir.

Eisini er fíggjarnevndin vitandi um, at avleiðingin av umlegging av skuldini er, at hallið á fíggjarlógini fyri 1996 verður økt við 75. mió. kr.

Út frá frammanfyri standandi tekur fíggjarnevndin ikki undir við uppskoti landsstýrisins, og setur einki uppskot fram í málinum.

2. viðgerð 7. februar 1996. Uppskotið fekk 8-0-20 atkvøður og fall.

F.L. j.nr. 1335-13/94.

24 Broyting í løgtingslóg um afturlatingartíðir fyri handlar

Ár 1995, mánadagin 11. desember legði Axel Nolsøe, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um afturlatingartíðir fyri handlar.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 56 frá 8. mai 1991 um afturlating artíðir fyri handlar verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 1, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Smásøla er bert loyvd gerandisdagar frá kl. 7.00 til kl. 17.30 og leygardagar til kl. 14.00, tó verður loyvt at hava opið til kl. 17.00 ein leygardag hvønn mánaða. Harumfram er smásøla loyvd 6 ½ tíma um vikuna. Hin einstaki handilin ræður sjálvur fyri, nær hesir tímar verða lagdir, tó kunnu teir ikki leggjast sunnu- og halgidagar, mánadag til fríggjadag eftir kl. 20.00 ella leygardag eftir kl. 14.00.

2) § 1, stk. 3 verður orðað soleiðis:
"Seinastu 6 dagarnar og tveir teir seinastu leygardagarnar undan jólaaftan er loyvt at hava opið til kl. 20.00, tó seinasta sunnudag undan jólaaftan bert frá kl. 14.00 til kl. 20.00."

3) Í § 1 verður sett sum stk. 6:
"Stk. 6. Hárfríðkanarstovur og stovur, ið veita vakurleikarøkt, mugu ikki hava opið fyri almenningin uttanfyri tær í stk. 1-3 nevndu upplatingartíðir. Stk. 4 verður at nýta samsvarandi."

§ 2.

Henda lógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar:

Handilslívið í Føroyum, kanska serliga í Tórshavn og á stórplássunum, hevur í longri tíð havt ynski framan, um at hava longur opið enn afturlatingarlógin nú beinleiðis loyvir ávísar dagar, eitt nú at hava leingi opið ein leygardag hvønn mánaða, sum skotið er upp.

Viðvíkjandi uppskotinum um at loyva handlandi at hava longur opið seinastu 6 dagarnar undan jólaaftan, kann viðmerkjast, at við uppskotinum verður vent aftur til tá raktarstøðu, sum var galdandi undan núverandi afturlatingarlóg frá 1991.

Hárfríðkanarstovur og stovur, ið veita vakurleikarøkt, eru ikki umlatnaðar av núverandi lóg um afturlatingartíðir. Landsstýrið metir, at reglurnar um afturlatingartíðir fyri handlar eisin skulu galda fyri hárfríðkanarstovur v.m.

At enda kann viðmerkjast, at uppskotið hevur verið til ummælis hjá S&K, Føroya Keypmannafelag og Føroya Landfúta. Tann parturin av uppskotinum, ið viðvíkir hárfríðkanarstovum v.m. er komin við eftir áheitan frá Føroya Handverksmeisturafelag. Hesin parturin hevur verið til ummælis hjá Føroya Handverkarafelag, ið tekur undir við uppskotinum.

1. viðgerð 13. desember 1995. Málið verð beint í vinnunevndina, sum 13. mars 1996 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 11. desember 1995 og eftir 1. viðgerð tann 13. desember 1995 beint í vinnunevndina.
Nevndin hevur viðgjørt málið. Undir viðgerðini hevur nevndin haldið fund við S&K, ein bólk av hárfríðk-

anarkvinnum og kvinnum, ið veita sólviðgerð, umboðum fyri handverkmeistarafelagið og umboðum fyri arbeiðsgevarafelagið.

Viðvíkjandi broyting 1), ein langan leygardag um mánaðan:
Umboðini fyri S&K vísti á, at limirnir í S&K, umframt vanliga arbeiðstíð, arbeiða yvir í samband við útsølu og upp ímóti løgtíðunum. Eisini varð fert fram, at ein ávís mongd av peningi er til staðar millum fólk, og kann sølan tí ikki økjast í longdini einans við at hava longri opið ein leygardag um mánaðan.
Umboðini fyri arbeiðsgevarafelagið førdi fram, at tey ynskja skipaði viðurskifti. Sum nú er, tulka tey ymisku bygdaráðini § 4, stk. 3 í galdandi lóg ymiski. Umboðini ynskja tí ein lógarfestan langan leygardag um mánaðan, soleiðis at tað ikki skal søkjast um loyvi. Hvørja ferð ynski er um at hava longri opið leygardag.

Viðvíkjandi broyting 2), broyting í afturlatingartíðini í jólavikan:
Umboðini fyri arbeiðsgevarafelagið ynskja ikki at hava opið til kl. 20.00 tveir leygardagar undan jólaaftan. Hetta er m.a. grundað á, at um jólaaftan er ein leygardag, vil tann fyrri leygardagurin liggja fyrst í desember mánaða. Hesi umboðini meta ikki at tørvur er fyri at hava meiru enn ein langan leygardag upp ímóti jólaaftan.

Viðvíkjandi broyting 3) um hárfríðkanarstovur og stovur, ið veita vakurleikarøkt.
Bólkurin av hárfríðkanarkvinnum og kvinnum ið veita sólviðgerð ítala at hárfríðkanarstovur og sólniðstøðir skulu undir lógina um afturlatingartíðir fyri handlar. Tær føra fram, at hárfríðkan er eitt handverk, og tí ber ikki til at seta sonnu afturlatingartíðir sum hjá handlum.

Viðvíkjandi sólviðgerð varð fert fram, at einki grundarlag er, um ein skal lata aftur kl. 1730. Fólk kemur ikki til sólviðgerð fyrr enn aftaná kl. 1500, og um tað skal bera seg peningaliga, má ein hava opið til langt út á kvøldi.

Fert varð fram, at kundagrundarlagið er minkað bæði tá talan er um hárfríðkan og sólviðgerð, av tí at fólk er flutt av landinum. Um lógaruppskotið verður samtykt mugu nógvar lata aftur, tí kundagrundarlagið ikki er til staðar.

Umboðini fyri handverkmeistarafelagið ynskja eina rammu um yrkið – hárfríðkan, so tær kunnu arbeiða undir skipaðum viðurskiftum. Ein fyritreyt má verða at kappingin er líka, men er verandi skipan kappingaravlagandi. Umboðini ynskja at hárfríðkan og vakurleikarøkt kemur undir afturlatingarlógina hjá handlum, men at sólviðgerð verður bildin uttanfyri. Lagt varð afturat, at tað vilja verða óskipaði viðurskifti so leingi yrkisgreinin ikki er undir fógarreglum viðvíkjandi afturlating.

Vitnunevndin metir ikki at grundarlag er fyri einum longum leygardegi um mánaðan, men at ein langur leygardagur skal loyvast um ársfjórðingin.

Um broyting 2) heldur nevndin, at bert skal verða loyvt at hava leingi opið seinasta leygardag undan jólaaftan. Orsøkin er, at um jólaaftan er ein leygardag, vil tann fyrri langi leygardagurin liggja fyrst í desember, og metir nevndin ikki at grundarlag er fyri hesum.

Ein samd nevnd setir tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

Í § 1 í uppskoti landsstýrisins verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 1, stk. 1, 1. pkt. verður orðað soleiðis:

"Smásala er bert loyvd gerandisdagar frá kl. 7.00 til kl. 17.30 og leygardagar til kl. 14.00, tó verður loyvt at hava opið til kl. 17.00 ein leygardag um ársfjórðingin."

2) § 1, stk. 3 verður orðað soleiðis:
"Seinastu 6 dagarnar og seinasta leygardagin undan jólaaftan er loyvt at hava opið til kl. 20.00, tó seinasta sunnudag undan jólaaftan bert frá kl. 14.00 til kl. 20.00."

Viðvíkjandi broyting 3) hevur nevndin býtt seg í ein meirilutu og tveir minnilutar.

Meirilutin (Henrik Old, Álvur Zachariasen, Jákup Joensen og Óli Jacobsen) førir fram, at hárfrískanarstovur og stovur, ið veita vakurleikarøkt, eins og handlar, hava 6 ½ tíma at ráða yvir um vikuna, sum kunnu leggjast eftir vanliga afturlatingartíð. Hárfríðkan er ein tænasta, og er neyðugt at hendan kemur undir skipaði viðurskifti. Tískil metir meirilutin tað ikki verða nakar trupulleiki hjá besum stovum at koma undir løgtingslógina um afturlatingartíðir fyri handlar. Tó er meirilutin sandir um, at sólviðgerð ikki skal verða undfata av lógini.

Meirilutin setir tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

Í § 1 í uppskoti landsstýrisins verður gjørd hendan broyting:

3) § 1, stk. 6 verður orðað soleiðis:
" Hárfríðkanarstovur og stovur, ið veita vakurleikarøkt, tó undantikið sólviðgerð, mugu ikki hava opið fyri almenninginum uttanfyri tær í stk. 1-3 nevndu upplatingartíðir. Stk. 4 verður at nýta samsvarandi."

Minnilutin (John Petersen og Jákup Olsen) tekur ikki undir við punkt 3) í uppskoti Landsstýrisins.

Minnilutin (Heini O. Heinesen) tekur ikki undir við punkt 3) í uppskoti Landsstýrisins.

2. viðgerð 21. mars 1996. Broytingaruppskot nevndarinnar til § 1, nr. 1 og 2 í uppskot landsstýrisins vurð samtykt við 23-5-1 atkvøðum. Broytingaruppskot meirilutans til § 1, nr. 3 í uppskoti landsstýrisins fekk 14-0-15 atkvøður og fall. § 1, nr. 3 í uppskoti landsstýrisins fekk 7-4-17 atkvøður og fall. Samtykt við 24-2-1 atkvøðum at beina málið soleiðis broytt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 26. mars 1996. Málið endaligt samtykt við 17-1-2 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 34 frá 16. apríl 1996.

F.L. j.nr. 1108-1/90.

25 Viðvíkjandi rentum í samband við bankaskuldina

Ár 1995, týsdagin 5. desember legði Jákup Olsen, løgtingsmaður vegna Kristiliga fólkaflokkin, Føroya Framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

Uppskot

til

Løgtingslóg um rentuútreiðslur í samband við bankaskuldina.

§ 1. Rentan av 2,7 milliardum krónum til danska statin fellur burtur, meðan bankakanningin fer fram sbrt. ríkislóg nr. 356. 8. juni 1995: Lov om undersøgelse af den færøske banksag.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1996.

Viðmerkingar:

Tá Føroya Landsstýri var í samráðingum við donsku stjórnina 3. november 1995 fingu teir at vita frá einum avgjørdum fíggjarmálaráðharra, Mogens Lykketoft, at verð tann føroyska skuldin til danska statin, sum stavar frá bankabjargingunum, strikað nú, so hevði danska stjórnin áfrið sær skyldina av bankamálinum, áðrenn serfrøðinganevndin veruliga var farin til verka.

Føroya Løgting eigur tí at svara donsku stjórnini aftur, at tað er órímuligt, at føroyingar skulu gjalda rentur av bankaskuldini, meðan kanningin fer fram, tí harvið átaka føroyingar sær skyldina av bankamálinum, og tí eiga ongar rentur at verða tilskrivaðar í hesum tíðarskeiði, eins og tað ikki er vanligt, at rentur verða goldnar, meðan sakarviðgerð fer fram.

Rentumar av 2,7 milliardum krónum um árið eru umr. 175 mió. krónur. Hesin peningur kann goymast, til sakin er av, ella verða nýttur til skattalætta, minka um sethúsaskuld hjá fólki, avleiku av avgjaldinum í olju og neyðsynjarvørum.

Tað hevur týdning, at allir tingmenn taka undir við hesum uppskoti, so at vit enn eina ferð standa saman sum ein maður eins og gjørt varð, tá Føroya Løgting samtykti dómarakanningina í sambandi við bankamálið.

Tekur Føroya Løgting undir við hesum uppskoti, kann tað eisini føra við sær, at bankakanningin ikki dregur út.

1. viðgerð 11. desember 1995. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 16. januar 1996 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum, Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 5. desember 1995, og eftir 1. viðgerð tann 11. desember 1995 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið á trimum fundum, tann 4. januar 1996, 10. januar 1996 og 11. januar 1996.

Ein samd nevnd fyrir fram, at hon ikki kann taka undir við uppskotinum hjá Kristiliga Fólkaflokkinum, tí tað einki endamál er í at lággeva einvist hesum viðvíkjandi. Skuldin til danska statin, sum stavar frá bankabjargingunum, er skuld í einum vanligum kreditor/-debitor forholdi, ið er avtalað millum partanna, og hetta hevur við sær, at danski staturin ikki er bundin av einari løgtingsloyv, ið viðtekur, at rentan ikki skal gjaldast. Verður rentan ikki goldin, kann kreditor, ið er danski staturin, mótrokna í blokkinum ella á annan hátt inn heinta peningin.

Undir samráðingunum millum danska stjórnina og Foroya Landsstýri segði danska stjórnin, at tafan ikki kann verða um at geva Foroyum rentuskáa, í sambandi við ta rentu, ið verður goldin danska ríkiskassanum, nú meðan bankamálið verður kannað. Fíggjarnevndin hevur skilt, at grundgevingin hjá stjórnini er, at ein rentuskái nú, kundi fort til, at danska stórnin harvið tekur sær ábyrgdina av bankaskuldini.

Út frá hesum heldur fíggjarnevndin tað verða rættast, at vit frá foroyskari síðu taka fyrivarni viðvíkjandi tí partinum av rentunum til danska ríkiskassan, sum stava frá tí partinum av skuldini, ið er stovnað í sambandi við bankabjargingarnar.

Ístaðin fyri uppskot Kristiliga Fólkafloksins, kundi fíggjarnevndin hugsað sær, at sett fram uppskot til samtyktar um tílíkt fyrivarni, men orsakað av reglum í galdandi tingskipan, letur hetta seg ikki gera. Hinvegin ent fíggjarnevndarliminir vorðnir samdir um, at teir sum logtingsmenn fara at seta fram hetta uppskot.

Út frá frammanfyri standandi tekur fíggjarnevndin ikki undir við uppskotinum frá Kristiliga Fólkaflokkinum, og setur einki uppskot fram í málinum.

2. viðgerð 22. januar 1996. Atkvoðugreiðslan útsett.

7. februar 1996. Málið afturtikið av uppskotsstillaranum.

26. Eykafíggjarløgtingslóg 1995.

Ár 1995, fríggjadagin 8. december legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

UPPSKOT TIL EYKAFÍGGJARLÓG 1995

INNTØKUR	INDTÆGTER	RØKNSKAPUR 1994	JÁTTAN 1995	Eyka-JÁTTAN 1995	Samlað JÁTTAN 1995
1 Inntøkuskattir	Indkomstskatter	788.453	789.000	84.000	873.000
2 Toll-, nýtslu- og framleiðslugjøld	Told-, forbrugs- og prod.afg	949.401	838.600	32.400	871.000
3 Onnur gjøld	Andre afgifter	2.765	13.700	-7.450	6.250
4 Inntøkur av spæli	Indtægter ved spil	853	700	-250	450
5 Rentuinntøkur	Renteindtægter	29.088	35.000	0	35.000
6 Landsfyritøkur	Landsvirksomheder	13.069	13.500	0	13.500
7 Partur av avlopi tjóðbankans	Andel af nat.bankens oversk.	0	25.000	0	25.000
8 Gjøld frá danska ríkiskassanum	Overførs. fra den danske stat	816.628	843.400	7.370	850.770
9 Ymsar inntøkur	Diverse indtægter	1.165	1.200	15.000	16.200
INNTØKUR TILSAMANS	IALT	2.601.422	2.560.100	131.070	2.691.170

RAKSTRARÚTREIÐSLUR	DRIFTSUDGIFTER	RØKNSKAPUR 1994	JÁTTAN 1995	Eyka JÁTTAN 1995	Samlað JÁTTAN 1995
10 Løgtingið	Lagtinget	16.861	17.353	-102	17.251
11 Meginfyrsiting	Centraladministration	140.239	152.258	350	152.608
Uttanríkismál	Udenrigsanliggender	1.619	1.700	0	1.700
12 Heilsumál	Sundhedsvæsen	347.961	345.615	695	346.310
13 Samferðsla og samskifti	Trafik og kommunikation	121.760	101.450	6.595	108.045
14 Útbúgving og gransking	Uddannelse og forskning	361.572	371.392	5.468	376.860
15 Mentan	Kultur	40.340	45.725	-725	45.000
16 Fiskivinna, sigling ot.	Fiskeri, søfart m.v.	244.479	228.194	22.046	250.240
17 Landbúnaður	Landbrug	24.884	24.123	109	24.232
18 Vinnulív og arbeiðsmarknaður annars	Erhverv og arbejdsmarked iøv	44.240	112.416	9.332	121.748
19 Almennamál vm.	Socialvæsen m.v.	738.758	759.210	-11.733	747.477
Ibúðarmál	Boligpolitiske anliggender	25.635	1.500	0	1.500
20 Pensiónsútreiðslur	Pensionsudgifter	11.064	9.965	0	9.965
21 Effektivar veðhaldsbindingar	Effektive garantiforpligtels	65.802	30.000	0	30.000
22 Renteútreiðslur	Renteudgifter	419.396	484.000	-22.024	461.976
26 Ymsar ognarútreiðslur	Diverse ejendomsudgifter	487	1.000	-253	747
27 Óvissar útreiðslur	Uvisse udgifter	0	0	0	0
RAKSTRARÚTREIÐSLUR TILSAMANS	DRIFTSUDGIFTER IALT	2.605.097	2.685.901	9.758	2.695.659

KRAV VIÐLÍKAHALD	HERAF VEDLIGEHOLDELSE	Røknskapur 1994	Játtan 1995	Eyka-Játtan 1995	Samlað Játtan 1995
12 Heilsumál	Sundhedsvæsen	11.332	8.050	0	8.050
13 Samskifti	Kommunikation	50.939	45.500	-406	45.094
14 Útbúgving og gransking	Uddannelse og forskning	7.926	6.000	06	6.086
Viðlíkahald annars	Vedligeholdelse iøvrigt	4.971	8.750	-253	8.497
VIÐLÍKAHALD TILSAMANS	VEDLIGEHOLDELSE IALT	75.168	68.300	-573	67.727

ILØGUÚTREIÐSLUR/ILØGUSTUDNINGAR	INVESTERINGSUDG./INVESTERING	Røknskapur 1994	Játtan 1995	Eyka-Játtan 1995	Samlað Játtan 1995
11 Miðfyrsiting	Centraladministration	0	0	0	0
12 Heilsumál	Sundhedsvæsen	18.005	8.000	0	8.000
13 Samskifti	Kommunikation	58.083	52.700	0	52.700
14 Útbúgving	Uddannelse og forskning	5.663	5.000	0	5.000
15 Mentan	Kultur	7.380	6.350	0	6.350
16 Fiskivinna, sigling ot.	Fiskeri, søfart mv.	10.000	5.200	0	5.200
18 Vinnulív og arbeiðsmarknaður annars	Erhverv og arbejdsmarked iøv	28.157	2.150	-200	1.950
19 Almennamál	Socialvæsen mv.	1.671	3.850	160	4.010
ILØGUÚTREIÐSLUR/ILØGUSTUDNINGAR TILSAMANS	INVESTERINGER/INV.TILSK.IALT	129.759	83.250	-40	83.210

SAMANDRÁTTUR	SAMMENDRAG	ROKNSKAPUR 1994	JÁTTAN 1995	Eyka-JÁTTAN 1995	Samlað JÁTTAN 1995
Inntøkur tilsamans	Indtægter ialt	2.601.422	2.560.100	131.070	2.691.170
Rekstrarútreiðslur tilsamans	Driftsudgifter ialt	2.605.097	2.685.901	9.758	2.695.659
Úrslit av rekstri	Driftsresultat	-3.675	-125.801	121.312	-4.489
Fløgur/fløgustudningar	Investeringer/inv.tilskud	129.759	83.250	-40	83.210
Úrslit aftaná fløgustreiðslur	Resultat efter investeringer	-133.434	-209.051	121.352	-87.699
Serligar útreiðslur	Ekstraordinære udgifter	240.281	0	0	0
Úrslit aftaná serligar útreiðslur	Resultat efr. ekstraord.udg.	-373.715	-209.051	121.352	-87.699

UPPSKOT TIL FÍGGJARLØGTINGSLÓG 1996

Rekstrar-etað	Konto-nummar	Rekstrar- og kontoheiti		Roknskapur 1994	Játtan 1995	Eyka-Játtan 1995	Samlað Játtan 1995
GREIN 1		INNTØKUSKATTIR	INDKOMSTSKATTER				
	1201	Vanligur landsskattur	Indkomstskat til landskassen	721.552	682.000	93.000	775.000
	1184	FAS-endurgjald	FAS-refusion	-8.072	-8.000	0	-8.000
	1215	felagsskattur	Selskabsskat	21.169	37.000	0	37.000
	1702	Rentuskattur	Renteskat	41.610	70.000	-17.000	53.000
	1721	Vinningsbýtisskattur	Udbytteskat	4.361	2.000	5.000	7.000
	1749	Avgj.av kapitaloftirlønsrútgj.	Afg.af kapitalpens.udb.	5.483	3.000	3.000	6.000
	1768	Tryggingarsambendið(skattur)	Forsikringselskabsskat	2.276	3.000	0	3.000
	1507	Aðrir skattir(sjómansskattur)	Andre skatter	74	0	0	0
TILSAMANS				788.453	789.000	84.000	873.000

		GREIN 2 TOLL-, NÝTSLU- OG FRAMLEIÐSLUGJØLD	TOLD- OG FORBRUGSAFGIFTER	Roknskapur 1994	Játtan 1995	Eyka-Játtan 1995	Samlað Játtan 1995
2022		Meirvirðisgjald	Merværdiafgift	508.445	510.000	14.900	524.900
2022	Z3593	Endurgjald f. goymslu	Lagerrefusion	-53.172			0
2017		Punktgjøld	Punktafgifter	159.632	155.000	-20.000	135.000
2017		Toligjøld	Toldafgifter	15.271	15.000	0	15.000
2055		Fíggjarognaravgjald	Afg. på finansielle aktiver	183.597	27.600	2.000	29.600
2069		Lønhaddargjald	Lønsumafgift	9.005	11.000	2.000	13.000
2041		Brennioljugjald	Brændselsolieafgift	69.562	66.000	2.000	68.000
2708		Framleiðslugjøld	Fremstillingsafgifter	12.651	13.000	1.000	14.000
2713		Skrásetingargjald	Registreringsafgifter	7.430	10.000	27.000	37.000
2801		Vegskattur	Vejafgifter	27.638	26.000	2.500	28.500
2863		Ferðaavgjald	Rejseafgift	9.342	5.000	1.000	6.000
TILSAMANS				949.401	838.600	32.400	871.000

		GREIN 3 ØNNUR GJØLD	ANDRE AFGIFTER	Roknskapur 1994	Játtan 1995	Eyka-Játtan 1995	Samlað Játtan 1995
3052		Gjøld f. spiritusskamtanarkort	Afg. f. spiritusration.kort	5	0	0	0
3102		Loyvisgjøld	Afgifter for bevillinger	43	100	0	100
3204		Arvagjøld	Arveafgifter	1.568	9.000	-6.500	2.500
3256		Lestagjald	Skibsafgift	141	100	50	150
3261		Umhvørvisavgjald á smyrjiolju	Miljøafgift på smøreolie	0	1.500	0	1.500
3636		Sala av seism. kanningarúrst.	Salg af seism. undersøgelsesres.		1.000	0	1.000
		Ónnur gjøld	Andre afgifter	184		0	0
3501		Bøtur	Bøder	824	2.000	-1.000	1.000
TILSAMANS				2.765	13.700	-7.450	6.250

	Eyka-	Samlað

GREIN 4 INNTØKUR AV SPØLI		INDTÆGTER VED SPIL	Roknskapur 1994	Játtan 1995	Játtan 1995	Játtan 1995
4011	Avlop av happadrátti	Overskud ved lotteri	392	0	0	0
4058	Burturlutingargjald	Afgifter af lotteri	66	200	-100	100
4098	Gjald av øðrum vinningum	Afgifter af andre gevinster	395	500	-150	350
TILSAMANS			853	700	-250	450

GREIN 5 RENTUINNTØKUR		RENTEN M.V.	Roknskapur 1994	Játtan 1995	Eyka-Játtan 1995	Samlað Játtan 1995
5105	Rentuinntøkur	Renteindtægter	29.088	35.000	0	35.000

GREIN 6 LANDSFYRITØKUR		LANDSVIRKSOMHEDER				
6408	Rúsdrekkasøla Landsins	Landets Spirituemonopol	11.600	12.500	0	12.500
6451	Landsbanki Føroya	Landsbanken	1.469	1.000	0	1.000
			13.069	13.500	0	13.500

GREIN 7 PARTUR AV AVLOPI TJÓÐBANKANS		ANDEL AF NATIONALBKS. OVERSK	Roknskapur 1994	Játtan 1995	Eyka-Játtan 1995	Samlað Játtan 1995
7011	Partur av avlopi tjódbankans	Andel i Nat.bankens oversk.	0	25.000	0	25.000

GREIN 8 GJØLD FRÁ DANSKA RÍKISKASSANUM		OVERFØRSLER FRA STATEN	Roknskapur 1994	Játtan 1995	Eyka-Játtan 1995	Samlað Játtan 1995
8001	Heildarveiting	Bloktilskud	825.856	843.400	0	843.400
	Mótrokning	Modregning	-18.295		0	0
8005	Afturgjald	Refusioner	9.067	0	7.370	7.370
TILSAMANS			816.628	843.400	7.370	850.770

GREIN 9 YMSAR INNTØKUR		DIVERSE INDTÆGTER	Roknskapur 1994	Játtan 1995	Eyka-Játtan 1995	Samlað Játtan 1995
9014	Ymsar inntøkur	Diverse indtægter	0	0	0	0
9015	Inntøkufert frá ábyrgdargrunninum				15.000	15.000
9218	Oljugoymslur	Oliesanlæg	1.165	1.200	0	1.200
TILSAMANS			1.165	1.200	15.000	16.200

			Roknskapur 1994	Játtan 1995	Eyka-Játtan 1995	Samlað Játtan 1995
INNTØKUR TILSAMANS		Indtægter ialt	2.601.422	2.560.100	131.070	2.691.170

GREIN 10 LØGTINGIÐ		LAGTINGET	Roknskapur 1994	Játtan 1995	Eyka-Játtan 1995	Samlað Játtan 1995
10018	Løgtingsmenn	Lagtingsmedlemmer	10.255	8.913	0	8.913
	Kanning av 80-árunum	Undersøgelse af adm. i 80erne		500	0	500
	Tænastuveiting t. tingarbeiði	Tjenesteydelser t. lagting		250	0	250
10106	Løgtingsbygningur	Lagtingsbygning	732	774	338	1.112
10158	Løgtingsskrivstovan	Lagtingssekretariatet	2.322	2.593	-64	2.529
10163	Tingmannaráð Útnorðurs	Vestnord. parlament.samarb.r	70	181	0	181
10177	Løgtingsins umboðsmaður	Lagtingets ombudsmand	0	300	-300	0
10208	Løgtingstíðindi	Lagtingstidende	200	200	0	200
10301	Grannskoðan(ekstern)	Revision (extern)	159	127	0	127
10403	Grannskoðan(intern)	Revision (intern)	2.686	2.800	-76	2.724
10505	Landsskattanevndin	Landsskatteudvalg	111	95	0	95

10607	Norðurlandaráðið	Nordisk Råd	177	350	0	350
RAKSTUR			16.712	17.083	-102	16.981
VIÐLÍKAHALD	Løgting og skrivstova	Lagting og kontorer	149	270	0	270
RAKSTUR TILSAMANS			16.861	17.353	-102	17.251

GREIN 11 LANDSFYRISITING		LANDSADMINISTRATIONEN	Rokn.skapur 1994	Játtan 1995	Eyka-játtan 1995	Samlað Játtan 1995
11015	Løgmaður og landsstýri	Lagmand og landsstyre	3.851	3.980	0	3.980
11048	Kunngerðasavn og -blað	Bekendtgørelsessaml.og -blad	351	350	0	350
11053	Landsskrivstovan	Landskontoret	13.648	15.500	798	16.298
	Fyrirleiking av umhvørvisfyrisiting		371		0	0
11034	Kanningar av alm. sektorinum			2.500	-1.222	1.278
11090	Fyrisiting av undirgrund	Undergrundsadministration	1.896	3.020	186	3.206
11262	Toll- og skattstova Føroya	Told- og skattedirektoratet	50.223	52.254	-830	51.424
11276	Skrásetingareftirlitið	Registertilsyn	0	200	0	200
11307	Landsfólkayvirlitið	Folkeregister	860	997	-10	987
11359	Almannastovan	Socialforvaltning	17.599	18.800	-625	18.175
11409	Landsskúlafyrisitingin	Landsskoleadministrationen	8.601	8.612	-128	8.484
11414	Stuðulsstovan	Administr. af udd.støtte	975	1.080	-33	1.047
11433	Fyrir. av nýggjari avgj.skipan	Forb. af nyt afgiftssystem	500	500	0	500
11452	Føroya Gjaldstova	Regnsk.dir. og fin.forvaltni	11.101	11.343	-237	11.106
11466	Fíggjaratýringarskipan vm.	Økonomistyringssystem mv.	227	7.000	0	7.000
11604	Valuta- og prisráð	Valuta- og prisråd	923	863	-31	832
11656	Lønarráðið	Lønningsråd	0	20	0	20
11706	Hagstovan	Færøernes Statistik	3.548	3.549	113	3.662
11711	Búskaparráðið	Økonomisk råd	0	150	0	150
11739	Norðurl. samv.,ráðherraráð v.m.	Nordisk samarb.,ministerråd	147	300	0	300
11758	Ferða- og dagp.innan- og uttanl.	Rejse-, dagp. inden- og uden	2.777	3.000	300	3.300
11808	Innheintingarútreiðstur	Udgifter ved inkasso	507	500	-11	489
11851	Ognin Tinganes	Ejendommen Tinganes	1.457	1.640	0	1.640
11879	Lógarasavn	Lovsamling	401	400	0	400
11898	Útskifting og matrikulstova	Udskiftn. og matrikelkontor	6.632	4.240	911	5.151
11901	Landsverkfræðingsskrivstovan	Landsingeniørens kontor	8.261	8.260	-281	7.979
11991	Aðrar útr.(Føroya Landsstýri)	Andre udgifter			0	0
203507	Umboðan	Repræsentation	920	800	450	1.250
253704	Útreiðstur av vali	Udgifter vedrørende valg	936	50	0	50
253753	Dóms- og løgreglumál	Retsvæsen og politi	26	50	0	50
373305	Landsstýrinum at ráða yvir	Landsstyret at råde over	1.918	1.500	1.000	2.500
RAKSTUR			138.636	151.458	350	151.808
11986 373409	Tinganes, umv./umb.	Tinganes, rep./omb.	1.500	400	0	400
	Friðaðar ognir á Reyni	Fredede ejend. úti á Reyni	9	300	0	300
	Viðlíkahald annars	Vedligehold iøvrigt	94	100	0	100
VIÐLÍKAHALD			1.603	800	0	800
RAKSTUR TILSAMANS			140.239	152.258	350	152.608
ÍLØGUR	Fyrisitingarbygn. keyp/umb.	Administrationsbygn.,køb/omb.			0	0
RAKSTUR OG ÍLØGUR TILSAMANS			140.239	152.258	350	152.608

UTTANRÍKISMÁL		UDENRIGSVÆSEN				
11948	Menningarhjálp	Udviklingsbistand	0	0	0	0
11967	Før.viðsk.st. Keypmannahavn	Før. repræsentationsk. Kbh.	1.042	1.000	0	1.000
11972	Uttanríkisten. í Aberdeen	Udenrigstjeneste i Aberdeen	577	700	0	700
RAKSTUR TILSAMANS			1.619	1.700	0	1.700

GREIN 12 HEILSUMÁL		SUNDHEDSVÆSEN	Rokn.skapur 1994	Játtan 1995	Eyka-játtan 1995	Samlað Játtan 1995
12007	Sjúkrakessar	Sygekasser	15.905	16.000	800	16.800
12026	Útr. viðv. Ríkissjúkrahúsinum	Udg. vedr. Rigshospitalet	34.074	32.500	0	32.500
12109	Landssjúkrahúsið	Landssygehuset	207.880	208.398	-789	207.609
12202	Klaksvíkar Sjúkrahús	Klaksvik sygehus	38.133	37.864	-51	37.813

12304		Suðuroyar Sjúkrahús	Suðuroyar sygehus	24.487	24.938	-40	24.898
12508		Læknar	Læger	2.492	2.700	0	2.700
12672		Skúlalæknaskipan	Skolelægeordning	222	264	0	264
12769		Arbeiðsmedisinsk klinikk	Arbejdsmedicinsk klinik	728	716	0	716
12774		Upplýsing um eyðkvami	Oplysning om AIDS	292	300	0	300
12788		Rúsevnisráðið	Narkotikabekæmpelsesråd	0	0	0	0
12907		Ymiskar útreiðslur	Diverse udgifter			0	0
	303011	Farsóttir	Epidemiske sygdomme	0	0	0	0
	303044	Xvíldarheimið Naina	Hvilehjemmet Naina	1.221	1.400	775	2.175
	303077	Vaksinationir	Vaccinationer	540	1.375	0	1.375
	303107	Uppl. um gitnaðarfyribyrging	Opl. om svangerskabsforebygg	323	350	0	350
	303115	Tubaksráðið	Tobaksskaderådet	100	0	0	0
	303148	Heilsukanningar av barnakonum	Sundhedskontrol for gravide	458	350	0	350
	303156	Læknakanningar av børnum	Lægeundersøgelser af børn	403	450	0	450
	303164	Kanning og viðg. av kynssjúkum	Behandl. af veneriske sygd.	21	10	0	10
	303243	Uppl./viðg.av rúsdrekkamisnýt.	Opl./Behandl. af alkoholiker	9.646	9.900	0	9.900
	373305	Landsstýrinum at ráða yvir	Landsstyret at råde over	604	50	0	50
RAKSTUR				336.629	337.565	695	338.260
		Hotel Tórshavn	Hotel Tórshavn	216	500	0	500
		Landssjúkrahúsið	Landssygehuset	10.116	7.000	0	7.000
		Klaksvíkar Sjúkrahús	Klaksvik sygehus	1.000	500	0	500
		Viðlikahald annars	Vedligehold iøvrigt		50		50
VIÐLIKAHALD				11.332	8.050	0	8.050
RAKSTUR TILSAMANS				347.961	345.615	695	346.310
12983							
	303808	Klaksvíkar Sjúkrahús,umv./umb.	Klaksvik sygehus, omb./nyb.				
	303816	Suðuroyar Sjúkrahús, nýb	Suðuroyar sygehus, nyb.	18.005	8.000	0	8.000
		Suðuroyar Sjúkrahúsi, umb.	Suðuroyar sygehus,omb.				0
	303832	Landslæknahúsini	Landslægehuset				0
	303857	Landssjúkrahúsið, umbygging	Landssygehuset, omb.				0
12997							0
	303903	Hotel Tórshavn, Keypmh.	Hotel Torshavn, København				0
	303911	Heilsumiðstøðir	Sundhedscentre			0	0
ÍLØGUR				18.005	8.000	0	8.000
RAKSTUR OG ÍLØGUR TILSAMANS				365.966	353.615	695	354.310

GREIN 13 SAMFERÐSLA OG SAMSKIFTI		TRAFIK OG KOMMUNIKATION	Rokningur 1994	Játtan 1995	Eyka-Játtan 1995	Samlað Játtan 1995
13251	Tyrlutænastan	Helikoptertjenesten	4.000	4.000	0	4.000
13265	Strandferðsla Landsins	Landets Trafikselskab	58.470	46.000	4.001	50.001
13089	Postverkið	Postvæsen	3.000	1.000	3.000	4.000
13125	Útvarpssendistøð, rakstur	Radiosender, drift	500	500	0	500
13106	Landsstýrinum at ráða yvir	Landsstyret at råde over	0	50	0	50
13079	Stuðul t. komm. t. asfaltering	Tilsk.t. komm. til asfaltering	4.851	4.400	0	4.400
RAKSTUR			70.821	55.950	7.001	62.951
13094	Rakstur av veganeti: 34 Vanligt hald, 36 Vetrarhald, 38 Ferjulegur, 39 Asfaltering:	Drift og vedligehold af vejnet	25.421	22.000	0	22,000
						0
13056	Fyritøkur og útgerð hjá LV: 56 Mobil, amboð, nýkeyp og rakstur, 57 Smiðjur, 58 Skervverk, 59 Asfaltverk:	Landsingeniørens virksomheder og redskaber	25.518	22.000	-406	21,594
						0
	Útvarps- og sjónvarpssendist.	Radio- og fjernsynsnet		1.500	0	1.500
VIÐLIKAHALD			50.939	45.500	-406	45.094
RAKSTUR TILSAMANS			121.760	101.450	6.595	108.045
13018	Nýggir vegir og brýr, breiðkan av brúm stórri áboltur v.m.: 30 nýggir vegir og brýr, 31	Nye veje og broer, udvidelse af broer m.v.				

	Trygdertiltøk, 33 Størri					
	åbøtur, 35 vegastokkur, 37					
	studningsvegir:		11.407	13.500	0	13.500
13018	Størri åbøtur, vegastokkur	Større vedligeholdelsesarb.	3.001	3.200	0	3.200
13061	Berghols- og brúgvagerð	Tunnel- og brobygning	7.856	7.000	0	7.000
	Nýgerð av landsveganeti				0	0
	LV, ekstern erbeiði	LV, eksterne opgaver	-101		0	0
13023	Havnagerð	Havnebygning	20.686	15.000	0	15.000
13037	Lendingar	Landingspladser	9.233	6.000	0	6.000
13042	Flogferðsla	Flyvetrafik	1.318	3.000	0	3.000
13989	Útvarps- og SV-sendistøðir	Radio- og TV-stationer	5.483	5.000	0	5.000
FLØGUR			58.883	52.700	0	52.700
RAKSTUR OG ILØGUR TILSAMANS			180.643	154.150	6.595	160.745

GREIN 14 ÚTBÚGVING OG GRANSKING		UDDANNELSE OG FORSKNING	Rokneskapur 1994	Játtan 1995	Eyka-Játtan 1995	Samlað Játtan 1995
	Fólkeskúlin oa.					
14103	Fólkeskúlin	Folkeskolen	127.353	130.163	115	130.278
14117	Lararaeftirlønir	Lærerpensioner	11.405	11.100	0	11.100
14122	Sernámsfrøðilig rádgeving	Specialundervisning	25.582	26.000	0	26.000
14136	Skúlabarnaflutningur	Transport af skolebarn	1.443	1.500	743	2.243
14141	Privatir skúlar	Private skoler	1.102	1.090	0	1.090
14155	Føroyskir skúlar uttanlands	Færøske skoler udenlands	230	260	0	260
14205	Suðuroyardepilin:	Suðuroycentret:	4.631	4.500	-40	4.460
14257	Fiskiídnaðarsk. í Norðstr.	Fiskeindustr.sk. i Norðstr.	2.316	2.563	-25	2.538
	Norðoyadepilin:	Norðoyacentret:			0	0
14307	Tekniski skúli í Klaksvík	Tekniske skole i Klaksvik	8.796	9.620	235	9.855
14326	Klaksvíkar Sjómansskúli	Klaksvik sømandsskole	2.349	2.399	0	2.399
14331	HF í Klaksvík	HF i Klaksvig	2.078	1.550	522	2.072
	Studentaskúlar og HF-skeiðir	Gymnasier og HF:			0	0
14364	Eysturoyar studentask. og HF	Eysturoy Gymnasium og -HF	10.285	10.580	-137	10.443
14378	Føroya Studentask. og HF	Færøernes Gymnasium og -HF	21.178	21.124	1.372	22.496
	Yrkisútbúgvingar:	Erhvervsuddannelser:			0	0
14409	Føroya Handilsskúli	Færøernes Handelsskole	15.112	16.387	850	17.237
14414	Tekniski skúli í Tórshavn	Tekniske skole i Thorshavn	11.600	12.000	-80	11.920
14428	Lærurað Føroya	Færøernes Lærerråd	2.727	4.094	-9	4.085
	Vegri útbúgvingar:	Videregående uddannelser:			0	0
14452	Føroya Lararaskúli	Færøernes Seminarium	9.759	9.759	0	9.759
14466	Føroya Sjómannaskúli	Færøernes Navigationsskole	7.168	7.123	-9	7.114
14471	Føroya Maskinskúli	Færøernes Maskinskole	6.009	6.000	150	6.150
14485	Dieselmotorsimulator	Dieselmotorsimulator	624	500	0	500
	Gransking, Fróðskaparsetur oa:	Forskning, Fær. Akademi oa.:			0	0
14554	Fróðskaparsetur Føroya	Færøernes Akademi	10.323	9.700	-262	9.438
14568	Stovn.á Debesartrøð,felagsútr.	Instit.på Debesart., fellesu	1.102	1.111	0	1.111
14573	Samarb. DGU/Føroya Jarðfr.savn	Samarb. DGU/F. Jarðfrøðissav	657	655	0	655
14587	Seismiskar kanningar	Seismiske undersøgelser	495	450	1.700	2.150
14592	Biofar-projektið	Biofar-projektet	450	650	-11	639
	Onnur undirvísing:	Undervisning iøvrigt:			0	0
14656	Fólkahaskúlar	Folkehøjskoler	2.033	2.149	0	2.149
14661	Húsarhaldsskúlar	Husholdningsskoler	1.100	1.100	0	1.100
14675	Frítíðarundirvísing	Fritidsundervisning	3.961	4.470	0	4.470
14689	Stuðul til musikkskúlar	Tilskud til musikskoler	3.730	3.822	-5	3.817
	Felagsútreiðslur:	Fællesudgifter:			0	0
14739	Ymiskt	Diverse	454	1.085	0	1.085
14744	Eftirútbúgving og skeið	Efteruddannelser og kurser	581	850	0	850
14758	Útgerð	Udstyr	200	3.000	0	3.000
14763	Fjølrít	Erst. t. forfattere	200	200	0	200
14777	Prøvtøkur	Udarb. av eksamensmateriale	2.917	3.045	0	3.045
14782	Burðarferlovvi	Barselsorlov	187	400	0	400
	Undirvís.tilfar og bókagerð:	Undervisningsmaterialer mv.:			0	0
14827	Landsmiðstøð f. undirv.amboð	Landscentr. for undervisn.ma	2.588	2.646	-23	2.623
14832	Skúlabókagerð	Skolebogsfonden	296	244	0	244
14846	Skúlabókútgáva	Udg. af skolebøger	3.669	3.669	-22	3.647
14851	St. t. rekstur av bókamiðsølu	Driftstilsk. t. bókamiðsølan	400	400	0	400
14865	Barnablað	Børneblade	100	100	0	100
14879	Barnabókútgáva	Børnebogsudgave	970	970	0	970
	Stuðulsveitingar:	Tilskud til uddannelser:			0	0
14901	Útbúgvingarstuðul	Uddannelsesstøtte	44.500	45.500	0	45.500
14915	Eftirútb. av sjómonnum	Efteruddannelse af sømænd	0	100	0	100

14934		St.t.fremm. ið lesa í Føroyum	Tilskud til ikke-færinger	33	35	0	35
14948		Námingastuðningur t. listamenn	Tilsk. t. kunstner. uddannel	40	40	0	40
14953		Meginfelag Føroyskra Studenta	MFS	200	200	0	200
14967	313646	Námingaheim, rekstrarstuðningur	Kollegier, driftstilskud	651	389	318	707
14972	373305	Landsstýrinum at ráða yvir	Landsstyret at råde over	62	100	0	100
RAKSTUR				353.646	365.392	5.382	370.774
		Studentaskúli í Hoydølum	Gymnasium, Hoydalar	1.990	1.000	0	1.000
		Skúlaheim v. Harknagilsvegin	Kollegium for færinge	1.747	3.000	0	3.000
		Skúlin á Tróni	Specialskole		600	0	600
		Teknískt Skúli í Klaksvík	Teknisk Skole i Klaksvik		500	0	500
114895	313829	Viðlíkahald annars	Vedligehold iøvrigt	4.189	900	86	986
VIÐLÍKAHALD				7.926	6.000	86	6.086
RAKSTUR TILSAMANS				361.572	371.392	5.468	376.860
14986	313327	Studentaskúli í Hoydølum, umb.	Gymasium i Hoydølum byg.				
14986	313343	Studentask. og HF á Kambsdali	Gymnasium og HF á Kambsdali	660			0
14986	313455	Miðnámsskúli í Suðuroy	Skole, Suðuroy		500		500
14991	313169	Fólkaháskúli, húsakeyp	Højskole, køb				0
14991	313177	Stórahús við Áir	Storehus við Áir				0
		Fiskivinnuskúlin, keyp/umb.	Fiskeriskole		0		0
		Sjómannaskúlin	Navigationsskole		0		0
14991	313302	Fólkaskúlin, nýbyggingar	Folkeskolen, nybyggeri	0	0		0
		Skúlabókagr., Innr.	Skolebogfonden, Indretn.	0	0		0
		Lærarasklin	Seminarium		0		0
		Maskinskúli	Maskinskole	5.003	4.200		4.200
		Námingaheim	Kollegie	0	300	0	300
ÍLØGUR				5.663	5.000	0	5.000
RAKSTUR OG ÍLØGUR TILSAMANS				367.235	376.392	5.468	381.860

GREIN 15 MENTAN		KULTUR	Rokneskapur 1994	Játtan 1995	Eyka-Játtan 1995	Samlað Játtan 1995
15109		Føroya Landsbókasavn	Landsbibliotek	4.083	4.250	-147	4.103
15202		Fólkabókasavn	Folkebiblioteker	4.619	5.109	0	5.109
15304		Landsskjalasavn	Landsarkiv	1.967	1.974	-71	1.903
15133		Handritanevnd			52		52
15406		Føroya Fornminnissavn	Færøernes museum	4.421	4.723	-110	4.613
15508		Bygdasavn	Bygdemuseer	1.389	1.389	0	1.389
15513		Friðað hús og fornminni	Fredede bygninger	513	511	0	511
15601		Útvarpið	Færøernes Radio	0	0	0	0
15615		Sjónvarp Føroya	TV	1.000	1.000	-266	734
15629		Mentunargrunnurin	Kulturfond	1.300	1.300	0	1.300
15634		Føroyahús í Keypmannahavn	Færøernes hus i København	900	900	0	900
15703		Náttúrugripasavn	Naturhistorisk samling	3.471	3.451	-120	3.331
15857		Náttúrufriðingarnevndir	Naturfredningsudvalg	181	200	0	200
15881		Mál- og navnanevndin	Sprog- og navnenævn	275	320	-11	309
15895		Tónleikur og sangur	Musik og sang	500	500	0	500
15907		Ymiskir stuðningar	Diverse tilskud			0	0
	323037	Leikpallur Føroya	Teater	1.700	1.700	0	1.700
	323086	Samlarp. t. skald og listafólk	Hædersg. t. digt- og kunstne	300	320	0	320
	323124	Norðurlandahús	Nordens hus	706	706	0	706
	323173	Orðabókaútgáva	Udgivelser af ordbøger	250	250	0	250
	323236	Listasavn	Kunstsamlinger	1.000	1.500	0	1.500
	323269	Før-isl-grønl.mentanarsamstarv	Før.-isl.-grønl. kultur.sama	112	130	0	130
	373305	Landsstýrinum at ráða yvir	Landsstyret at råde over	299	400	0	400
	323277	Norrøna felagið	Nordisk forening	150	150	0	150
	323198	Ungmannafelag og skótarørsla	Ungdomsfor. og spejderbevæg.	600	600	0	600
	323402	Studn.t. politiska upplýsing	Tils.t.polit. oplysningsarb.	2.552	2.500	0	2.500
15931		Stuðningur til kirkjugrunnin	Tilskud til kirkefonden	3.000	3.000	0	3.000
15959		Studn. til Fótbóltssambandið	Tilskud til FSF	700	700	0	700
	323713	Studn. til Íróttarsambandið	Tilskud til ÍSF	2.429	2.360	0	2.360
	323721	Studn. til ferðir innanoyggja	Tilskud til rejser	1.287	1.350	0	1.350
RAKSTUR				39.704	41.345	-725	40.620
		Føroya Fornminnissavn	Museum	425	500	0	500
15983	323356	Kirkjubømúrurin	Muren i Kirkjubø	76	300	0	300

		Føroya Náttúrugripasavn			2.150	0	2.150
		Føroya Landsskjalasavn	Færøernes Landsarkiv		300	0	300
		Føroya Landsbókasavn	Færøernes Landsbibliotek		520	0	520
		ÍSF-húsið	ÍSF-huset		300	0	300
		Viðlíkahald annars	Vedligehold iøvrigt	135	310	0	310
VIÐLÍKAHALD				636	4.380	0	4.380
RAKSTUR TILSAMANS				40.340	45.725	-725	45.000
15983	323945	Prestagarður í Sandagerði,savn	Præstegård i Sandagerði				
		Kirkjubæmúrurin		-3		0	0
	323285	Savn í Hoyvík, umv.	Museum i Hoyvik			0	0
	323492	Sjónvarp Føroya, nýb./umb.	TV, nyb./omb.	1.749	600	0	600
		Føroya Fornminnissavn	Museum for oldtidsfund	3.234	1.340	0	1.340
15997	323236	Listasavn Føroya	Færøernes Kunstsamling	700	1.210	0	1.210
		Íløgust.t.kirkjur og ment.bygginv.	tilsk.t.kirk.og kulturbygg.		2.000	0	2.000
	323181	St.t. bygdarhús, nýb.	Tilskud til bygdehus, nyb.	900	900	0	900
	323754	Leguhús, Nesvík	Lejrsted i Nesvik	0	0	0	0
	323738	Studningur t. Ítróttarbygging	Byggetilskud til idræt	800	300	0	300
	323937	Grasvikisvøllir	Kunstgrasbaner		0	0	0
ÍLØGUR				7.380	6.350	0	6.350
RAKSTUR OG ÍLØGUR TILSAMANS				47.720	52.075	-725	51.350

Viðm: Studningur til politiska upplýsing: Hendu upphædd verður eftir umsókn býttur millum politisku flokkarnar, ið aftaná hvørt løgtingsval eru umboðaðir á tingi og í mun til atkvæðutal flokkanna. Um tingmaður/menn fara úr einum flokki í valskeiðinum skal upphæddin býtast í mun til tingmannatalið.

GREIN 16 FISKIVINNA, SIGLING OT.			FISKERI, SØFART O.L.	Rokn.skapur 1994	Játtan 1995	Eyka-Játtan 1995	Samlað Játtan 1995
16301		Vaktar- og bjørgingartænastan	Vagt- og bjørgningstjeneste	16.123	16.100	318	16.418
16367		Bjørgingarfelløg	Redningsforeninger	0	180	0	180
16372		Skipaskrá og-uppmáting	Skibsregistrering og -opmåling		0	0	0
11086		Sjóvinnufyrisiting	Søfartsadministration		0	0	0
16386		Sjóvinnufyris.& Skráseting Fø.	Søfartsadm.& Skibsreg.	1.363	1.500	-29	1.471
16505		P/F Fiskaaling (rekstur)	Fiskeopdræt, driftstilskud	1.380	1.324	0	1.324
16391		Kavbít á Føroya Banka	Opdrætsforsøg på Færøya Bank	600	600	0	600
16403		Royndir innan havbúnað	Fiskeopdrætsforsøg	5.131	5.700	0	5.700
16422		Lønjevningargrunnurin	Løngarantifonden	2.000	2.000	0	2.000
16417		Studningar til fiskivinnuna	Tilskud til fiskerierhvervet			0	0
16436		Inntøkutrygd hjá fiskimonnum	Indkomstsikr. for fiskere	99.000	90.000	12.000	102.000
16417		Íløgustuðul	Investeringstilskud	63.714	60.000	8.000	68.000
16469		Varðveiting av fjølbr. flota	Bibeholdelse af differ.flåde	4.796	3.600	0	3.600
16474		Endurgj.f.upph.av gl. fiskiskiðrs.	f.kondemn. gl.fiskefart.			0	0
16480		Praktiskar fiskiroyndir	Praktiske fiskeriforsøg	7.975	8.000	0	8.000
16493		Hvelastøðin við Áir	Hvalstationen við Áir	8	40	0	40
16519		Fiskirannsóknarstovan	Fiskeribiologisk laboratoriu	6.192	6.139	0	6.139
16607		Fiskivinnuráð	Fiskeriråd	320	250	-16	234
16626		Magnus Heinason	Magnus Heinason	6.123	6.241	0	6.241
16904		Aðrir studningar	Andre tilskud			0	0
	333129	Upplýsing um grind	Oplysning om grindehvalfangs	163	260	0	260
	333208	Limagjald í fleirtj.felagssk.	Medlems. i intern. fællessk.	613	860	0	860
	333224	Lóg nr.26 umsjúkur hjá fiskiog s.			0	1.773	1.773
	333407	Tiltøk fyri alivinnuna	Tiltag vedr. fiskeopdræt	28.521	25.000	0	25.000
	333456	Skipsdagbátur		-3		0	0
	373305	Landsstýrinum at ráða yvir	Landsstyret at råde over	303	100	0	100
RAKSTUR				244.322	227.894	22.046	249.940
VIÐLÍKAHALD				157	300	0	300
RAKSTUR TILSAMANS				244.479	228.194	22.046	250.240
16994	333909	Fiskaaling, við Áir/Skopun	Fiskeopdræt, við Áir/Skopun	10.000	5.200	0	5.200
16994	333958	Vaktarskip, keyp/nýb/umb	Kystvagt, køb/nyb/omb	0	0	0	0
ÍLØGUR				10.000	5.200	0	5.200
RAKSTUR OG ÍLØGUR TILSAMANS				254.479	233.394	22.046	255.440

GREIN 17 LANDBÚNAÐUR			LANDBRUG	Rokneskapur 1994	Játtan 1995	Eyka-Játtan 1995	Samlað Játtan 1995
17015		Landsdjóralæknaembatið	Landsdyrlægeembedet	2.900	2.063	-38	2.025
17029		Djóralæknatænastan	Dyrelægetjeneste		1.000	57	1.057
17034		Fiskasjúkutænastan	Fiskesygetjeneste		0	0	0
17205		Almennar royndir og rádgeving	Off.rådg. og forsøg	1.905	2.000	-30	1.970
17219		Avloys.sk.f.mjólkaframl.	Ferieordn. for mælkeprod.	480	480	0	480
17307		Skógrækt landsins	Landets skovvæsen	1.220	1.200	0	1.200
17409		Fuglakanningarstøð vm.	Ornitologisk station m.v.	330	330	0	330
17502		Stuðul til ullavasking	Støtte til uldvask			0	0
17898	343013	Landbúnaðarstudningar:	Landbrugstilskud:	16.500	14.500	0	14.500
17898	343133	Studn.t. neyta- og seyðakjøt	Tilskud til kød	1.500	2.500	0	2.500
17901	373305	Landsstýrinum at ráða yvir	Landsstyret at råde over	49	50	120	170
RAKSTUR				24.884	24.123	109	24.232
VIÐLÍKAHALD				0	0	0	0
RÁKSTUR TILSAMANS				24.884	24.123	109	24.232

GREIN 18 VINNULÍV OG ARBEIDSMARKNAÐUR ÁNNARS			ERHVERV OG ARB.MARKED IØVR.	Rokneskapur 1994	Játtan 1995	Eyka-Játtan 1995	Samlað Játtan 1995
18109		Arbeiðseftirlitið	Arbejdstilsyn	2.684	2.600	-18	2.582
18152		Brannvenjingarstøð við Áir	Brandtræningsskolen ved Ålr	129	150	0	150
18166		Brunaumsjón Landsins	Brandsikkerhedstilsyn	-4	0	0	0
18202		Bileftirlitið	Biltilsyn	0	0	0	0
18216		Radioeftirlitið	Radiotilsyn	300	356	0	356
18235		Ráðið fyri ferðstutrygd	Rådet for færdselssikkerhed	700	700	0	700
18268		Filmseftirlitið	Filmtilsynet	230	300	0	300
18318		Sømingsmannaskipan	Forligsinstitution	52	160	0	160
18323		Studningur til kolagrevstur	Tilskud til kulminedrift	300	300	0	300
18342		Skeiðvirksemi	Kursusvirksomhed	0	0	0	0
18356		Ferðaráð Føroya	Turistcentralen	4.201	7.000	-31	6.969
18361		Menningarstovan	Kontor for industriel udvikl	2.200	2.200	-16	2.184
18508		Norrøna Tiltakið	Vestnordensprojektet	100	100	0	100
18513		Menningargrunnur Útnorðurs	Vestnordenfonden	102	100	0	100
18527		Menningargrunnur Iðnaðarins	Til udviklingsfond	0	0	0	0
18532		Stuðul til Iðnaðarfr. endamál	Støtte til industrifr. formå	1.500	3.000	7.500	10.500
18496		Skipsbyggiendurgjald	Ref. i forb. m. skibsbyggeri	3.464	3.000	0	3.000
18551		Farmaflutningsendurgjald	Fragtrefusion			0	0
18565		Tollendurgjald	Toldrefusion			0	0
18579		Rentustudningur	Rentetilskud			0	0
18584		St.t.menning av fiskiv.á landi	Udvikl.tilsk.t. fiskerierhv.	9.538	19.000	0	19.000
18598		Sáttmálaeftirlit	Konsulenter,vurd.af fartøjer	42	0	0	0
18601		Heilsufrøðilig starvsstova	Hygiejnisk laboratorium	4.875	5.300	-103	5.197
18615		Góðskueftirlit	Fiskekvalitetskontrol	1.995	2.000	0	2.000
		Kappingartiltagandi tiltøk	Tiltag til konk.tilpasning		5.000	0	5.000
18653		Orkuráðið	Energirådet	109	0	0	0
18667		Orkuráðið, kanningarvirksemi	Energirådet, undersøgelser	-73	0	0	0
18411		Elnevndin	Elektricitetsudvalget		100	0	100
18703		Tiltøk fyri ung	Tiltag for unge	9.967	8.000	0	8.000
18722		Arbeiðsloysisskipanin	Arbejdsløshedsforsikringen		50.000	0	50.000
18389		Javnstøðunevndin	Ligestillingsudvalget	118	150	0	150
18546		Stuðul t. Grunn Ferðavinnunar	Tilskud t. Turisterhv.fonden	0	0	0	0
18648		Reinsan av spillolju	Rensning af spildolie	1.635	2.050	0	2.050
18672		Oljuvinna, kanningar	Olieudvinding, undersøgelser	0	0	0	0
18857		Stuðul til nýggjar vinnur			0	2.000	2.000
18964	373305	Landsstýrinum at ráða yvir	Landsstyret at råde over	50	50	0	50
RAKSTUR				44.214	111.616	9.332	120.948
Heilsufrøðilig Starvsstova			Hygiejnisk Laboratorium		500	0	500
Viðlíkahald annars			Vedligehold iøvrigt	80	300	0	300
VIÐLÍKAHALD				26	800	0	800
RÁKSTUR TILSAMANS				44.240	112.416	9.332	121.748
18686		Stuð.t. umhvervisverndartiltøk	Tilskud t. miljøbesk.projekt	210	1.000	0	1.000

		Breyt til koyrifrálaru	Køreteknisk anlæg		750	0	750
		Føroya Brandskúli	Brandskole		400	-200	200
		Feröam.miðst.Kristnastova,umb.	Turistcentralen, Kristnastov	0	0	0	0
		Partabrøv í P/F Elektron	Aktier i P/F Elektron	1.947		0	0
		Framtaksgrunnurin		1.000		0	0
		Grunnfø, framtaksfelløg	Grundkapital, venturelselskab	0		0	0
		Vinnufremjandi virksemi	Erhvervsfremmeforanstaltning	25.000		0	0
18983	353374	Heilsufr. Starvsstova, nýb.	Hygiejnisk Laboratorium, nyb	0	0	0	0
ÍLØGUR				28.157	2.150	-200	1.950
RAKSTUR OG ÍLØGUR TILSAMANS				72.397	114.566	9.132	123.698

GREIN 19 ALMANNAMÁL VM.			SOCIALVÆSEN M.V.	Rokn.skapur 1994	Játtan 1995	Eyka-Játtan 1995	Samlað Játtan 1995
19042		Serforsorg	Serforsorg	34.262	43.500	1.200	44.700
19441		Ymiskir forsorgerstovnar	Forsk. forsorgsinstitutioner	9.227	0	0	0
19056		Fólkapensjón	Folkepension	242.216	242.450	4.100	246.550
19075		Røktarheim	Plejehjem	67.201	69.500	-2.263	67.237
19089		Vistarheim fyri pensionistar	Boliger for pensionister	4.854	5.700	-700	5.000
19106		Avlamiðapensión	Invalidepension	114.752	115.650	3.800	119.450
19208		Einkjubarnastyrkur	Børnebid. til enlige forsørg	3.341	1.694	0	1.694
19227		Fóroyrkotsrindan av barnapengum	Alimentation		2.056	-1.000	1.056
19301		Einkjupensjón	Enkepension	1.992	1.900	300	2.200
19403		Vanlig forsorg	Almindelig forsorg	73.376	40.600	-2.500	38.100
19417		Forsorg vegna arbeiðsloysi	Forsorg pgra. arbejdsløshed		35.000	-16.300	18.700
19436		Umsiting av hjálpitólum	Admin. av hjælpeudstyr	1.953	2.000	48	2.048
19519		Uppiskoytisveiting	Tillægsydelse			0	0
19557		Barnaforsorg	Børneforsorg	12.993	13.708	6.500	20.208
19607		Heimarøktarskipanin	Hjemmeplejeordningen	58.008	60.070	1.500	61.570
19612		Vardar íbúðir, stuð.t. rakstur	Beskyttede boliger, dr.tilæk	177	300	0	300
19631		Dagstovnar	Daginstitutioner	44.140	47.000	-2.000	45.000
19659		Dagpeningaskipanin	Dagpengeordning	31.487	32.000	-2.100	29.900
19664		Sjálv., hús hjá pensionistum	Isolering af pensionistbolig	0	2.000	0	2.000
19678		Vlóðót til óvfsar pensionistar	Sertillæg til pensionister	6.285	6.500	0	6.500
19683		Barnastyrkur	Børnetilskud			0	0
19697		Sams.f. ans.eldri og óhj.heima	Vederl.for at passe ældre hj	4.746	5.400	-1.000	4.400
19802		Løn til pedagogar undir viðari útbúgving			0	125	125
19868		Føroyingar á stovni í Danmark	Færinger på danske inst.	17.470	22.600	-1.700	20.900
19887		Kærunevnd og umsiting	Ankenævn og administration	404	450	0	450
19892		Vanlukkutryggingarráðið	Ulykkesforsikringsrådet	511	150	257	407
19904		Ymsir studningar	Forskellige tilskud			0	0
	363399	Krísupmiðstøð	Krisecenter	400	496	0	496
	363557	Hús hjá deyvafelagnum	Døves foreningshus	630	630	0	630
	363565	Blindaheimið	Blindehjemmet	3.464	3.464	0	3.464
	363603	Styrkveiting	Understøttelse	65	100	0	100
	363628	ALV	ALV	300	340	0	340
	363644	Reyði Krossur	Røde Kors	30	50	0	50
	363652	Kjálpargr.f.óarb.førar fiskim.	Fonden f. uarbejdsd. fiskere	400	400	0	400
	363669	Felag teirra brekaðu	Forem. handikappede	800	800	0	800
	363797	Ráðg.f.føroyingar í Danmark	Rådg. for færinger i Danmark	507	532	0	532
	363677	Eldraráð	Ældrerådet		50	0	50
	363843	Ráð fyri brekað	Handicapråd		50	0	50
	363851	Landsfelag pensionistanna	Pensionisternes landsforenin	200	200	0	200
	363835	Trygdargr. f. avreið. og lønir	Lønmodtagerens garantifond	470	470	0	470
	373305	Landsstýrinum at ráða yvir	Landsstyret at råde over	184	200	0	200
RAKSTUR				736.845	758.010	-11.733	746.277
		Viðlíkahald annars		1.913	1.200	0	1.200
VIÐLÍKAHALD				1.913	1.200	0	1.200
RAKSTUR TILSAMANS				738.758	759.210	-11.733	747.477
19994	363524	Vardar íbúðir	Besk. pensionistboliger				
		Bústovnar, serforsorg	Dagninstit., serforsorg		1.200	600	600
19994	363532	Dagheim á Berjabrekku, nýb.	Daginst., Berjabrekka	207		0	0
		Uml.heim og bústovnur, Suðuroy	Dagninst., Suðuroy	702	800	760	1.560
		Eldrasambýli	Ældrebofællesskaber	500	1.000	0	1.000
		Norðoya Vistarheim	Norðoya plejehjem		850	0	850
		Lærgarður og Eyst. røktarheim	Lærgarður og Øst.plejehjem	262		0	0
19994	363777	Sandoyar Ellis- og røktarheim	Sandoy alderd. og plejehjem			0	0

ÍLØGUR	1.671	3.850	160	4.010
RAKSTUR OG ÍLØGUR TILSAMANS	740.429	763.060	-11.573	751.487

ÍBÚÐARMÁL		Rokn.skapur 1994	Játtan 1995	Eyka-Játtan 1995	Samlað Játtan 1995
19956 Húsalánagrunnurin	Boliglånefondet	25.000	0	0	0
19961 Íbúðargrunnur	Boligfond	0	0	0	0
19975 Rentustuðn. til húsabygging	Rentetilskud t. husobsparing	635	1.500	0	1.500
RAKSTUR TILSAMANS		25.635	1.500	0	1.500

GREIN 20 EFTIRLØNARÚTREIÐSLUR	PENSIONSUDGIFTER	Rokn.skapur 1994	Játtan 1995	Eyka-Játtan 1995	Samlað Játtan 1995
20013 Eftirlønarútreiðslur	Pensionsudgifter				
103558 Eftirlønir	Pensioner	828	815	0	815
103599 Danskar eftirlønir	Danske pensioner	246	250	0	250
103612 Biðipeningur	Ventepenge	2.053	600	0	600
103629 Tænastumannaeftirlønir	Tjenestemandspensioner	7.937	8.300	0	8.300
RAKSTUR TILSAMANS		11.064	9.965	0	9.965

GREIN 21 EFFEKTIVAR VEÐHALDSBIXDINGAR	EFFERTIVE GARANTIFORPLIGTELS	Rokn.skapur 1994	Játtan 1995	Eyka-Játtan 1995	Samlað Játtan 1995
21019 Eff. veðh. f. privatfyritøkur	Eff.gar.overf.private virks.	65.802	30.000	0	30.000
Eff.veðh.f. alm. gr. og virki	Eff.gar.overf.off.f.& virks.	0	0	0	0
Eff.veðh. fyri kommunum	Eff.gar. for kommuner	0	0	0	0
RAKSTUR TILSAMANS		65.802	30.000	0	30.000

GREIN 22 RENTUÚTREIÐSLUR	RENTEUDGIFTER	Rokn.skapur 1994	Játtan 1995	Eyka-Játtan 1995	Samlað Játtan 1995
22206 163018 Rentur	Renter	405.509	472.000	-37.052	434.948
Kurstap	Kurstab	13.800	10.000	17.028	27.028
22206 163258 Rentur av bundnari uppsparing	Renter af bunden opsparing	87	2.000	-2.000	0
RAKSTUR TILSAMANS		419.396	484.000	-22.024	461.976

GREIN 26 YMSAR OGNARÚTREIÐSLUR	DIVERSE EJENDOMSUDGIFTER	Rokn.skapur 1994	Játtan 1995	Eyka-Játtan 1995	Samlað Játtan 1995
26305 Ymsar ognarútreiðslur	Diverse ejendomsudgifter	487	850	-203	647
Skráseting av landsins ognum	Registr. af off. ejendomme		150	-50	100
		487	1.000	-253	747

GREIN 27 REGULERINGAR	REGULERINGER	Rokn.skapur 1994	Játtan 1995	Eyka-Játtan 1995	Samlað Játtan 1995
27005 Endurgj. t.alm.stovn. fyri MVGlomsref. til off. insr.					
RAKSTUR TILSAMANS		0	0	0	0

GREIN 28 SERLIGAR ÚTREIÐSLUR	EKSTRAORDINÆRE UDGIFTER				
Rentur viðv. 1993, goldnar 1994	Renter vedr. 1993, bet. 1994	117.586			
Lánsbr.kurstap, frá uppt. til 1.1.1994	Obl.kurstab, fra opt. til pr	72.695			
Eginpeningur, Menningargrunnurin	Egenkap., Udviklingsfonden	5.000	0	0	0
Eginpeningur, Iðnaðargrunnurin	Egenkapital, Industrifonden	45.000	0	0	0
Eginpen., Føroya Banki og Sjóvinnubankin	Egenkap., Før.Bk & Sj.bankin	0	0	0	0
SERLIGAR UTREIÐSLUR TILSAMANS		240.281	0	0	0

RAKSTRAR- OG ÍLØGUETLAN	DRIFTS- OG ANLÆGSBUDGET	Rokniskapur 1994	Játtan 1995	Eyka-Játtan 1995	Samlað Játtan 1995
INNTØKUR TILSAMANS	INDTÆGTER IALT	2.601.422	2.560.100	131.070	2.691.170
RAKSTRARÚTG.(-RENTUÚTR.VEDH.OG VIDLIKAH.)	DR.UDG.(-GAR.RENTER OG VEDL.	2.044.880	2.103.871	32.355	2.136.226
RENTUÚTREIDSLUR	RENTUÚTREIDSLUR	419.396	484.000	-22.024	461.976
EFFEKTIV VEDHALDSÚTLEDG	EFF. GARANTIFORPLIGTELSER	65.802	30.000	0	30.000
VIDLIKAHALDSÚTREIDSLUR	VEDLIGEHOLDELSESUDGIFTER	75.019	68.030	-573	67.457
ÍLØGUÚTREIDSLUR TILSAMANS	INVESTERINGSUDGIFTER IALT	129.759	83.250	-40	83.210
VANLIGAR ÚTREIDSLUR TILSAMANS	ORDINÆRE UDGIFTER IALT	2.734.856	2.769.151	9.718	2.778.869
SERLIGAR ÚTREIDSLUR	EKSTRAORDINÆRE UDGIFTER	240.201	0	0	0
ÚTGIFTER IALT	UDGIFTER IALT	2.975.137	2.769.151	9.718	2.778.869
ÚRSLIT AV RAKSTRI OG ÍLØGUM	RESULTAT E.DRIFT OG INVEST.	-133.434	-209.051	121.352	-87.699
ÚRSLIT AFTANÁ SERLIGAR ÚTREIDSLUR	RESULTAT EFT. EKSTRAORD.UDG.	-373.715	-209.051	121.352	-87.699

GJALDFØRISETLAN	LIKVIDITETSBUDGET	Rokniskapur 1994	Játtan 1995	Játtan 1995	Játtan 1995
NETTOÚTLÁN	NYUDLÁN				
333025 St.lán t. fiski- og farmaskip	Tilsk.lán t.fiske-og fragtsk	0	0		
Likvidit.lán,fiski- og farmask.	Likvidit.lán,fiske- og fragt	7.500	5.000	0	5.000
313152 Gr. til útbúgving, nýútlán	Uddannelsesfond, nyudlån	9.500	9.500	0	9.500
Lán til ALS				70.000	70.000
Lán til kúsalánsgrunn	Lån til husånefonden		50.000	0	50.000
Lán til heilsumiðstøðir	Lån til sundhedscentre	0	0	0	0
NÝÚTLÁN TILSAMANS	NYUDLÅN IALT	17.000	64.500	70.000	134.500
INNGJALD AV AVDRÁTTUM	INDBET. AF AFDRAG	20.000	20.000		20.000
NETTOÚTLÁN TILSAMANS	NETTOUDLÅN IALT	-3.000	44.500	70.000	114.500
RAKSTRAR, ÍLØGU- OG ÚTLÁNSHALL	DAU-UNDERSKUD	-370.715	-253.551	51.352	-202.199

BROYTING Í VIRDI OG SKULD V. M.	ÆNDRINGER I STATUSPOSTER	Rokniskapur 1994	Játtan 1995	Játtan 1996	Játtan 1997
BROYTINGAR Í VIRDI:	ÆNDRINGER I AKTIVER:				
Lánsbrev	Obligationer				
Útlán	Udlån				
Skatta-,toll-,og aðr.skuldarar	Skatte-,afg. og a. skyldnere		50.000		-50.000
Mlmrekn.v.komm. og alm.stovnar	Mlm.regn. m. komm. og off. inst.				
Aðrir skuldarar	Andre debitorer				
Tíðarevmarkingar	Periodiseringer				
Tekur og bundin peningur	Disp. og bundne indestående				
BROYTINGAR Í SKULD V.M.:	ÆNDRINGER I PASSIVER:				
Reguleringspostur til halt	Reguleringspost t. underskud				
Útjavningarkonto	Balancekonto				
Onnur skuld	Anden gæld				
Tíðarevmarking	Periodiseringer		95.000		95.000

TILSAMANS		0	45.000	0	45.000

NETTOKASSAHALL	NETTOKASSEUNDERSKUD	-370.715	-208.551	51.352	-157.199

AFTURGJALD AV LANDSKASSASKULD	TILBAGEBET.AF LANDSKASSEGÆLD	Játtan 1994	Játtan 1995	Eyka-Játtan 1995	Samlað Játtan 1995
AVDRÁTTIR AV UTTANLANDA LÁNI	AFDRAG PÅ UDENLANDSKE LÅN	470.000	795.000		795.000
AVDRÁTTIR UPPÁ SKULD Í DÁNMARK	AFDRAG PÅ GÆLD I DANMARK	1.169.000	185.000		185.000
AFTURGJ. AV VEKSILSKULD TIL TJÓÐBANKAN	REDBR. AF GÆLD T. NATIONALB.	100.000	0		0
AFTURGJALD AV BUNDNARI UPPSPARING	TILBAGEBET. AF BUNDEN OPSPAR	0	36.000		36.000
AFTURGJALD AV ÍLBGJGRUNNUM	TILBAGEBET. AF INVEST.FONDE		80.000		80.000
AVDRÁTTIR AV FØR. LÁNUM	AFDRAG PÅ INDENLANDSKE LÅN	56.000	370.000		370.000
AVDRÁTTIR TILSAMANS	TILBAGEBETALING AF GÆLD	1.795.000	1.466.000	0	1.466.000

BRUTTOKASSAHALL	BRUTTOKASSEUNDERSKUD	-2.165.715	-1.674.551	51.352	-1.623.199

		Játtan 1994	Játtan 1995	Eyka-Játtan 1995	Samlað Játtan 1995
ÚTVEGAN AV GJALDFØRI, BRUTTOLÁNITØRVUR	LIKV.FRENSKAFFELSE, LÅNEBEHO	-2.165.715	-1.674.551	51.352	-1.623.199
FØROYSKIR PENINGASTOVNAR					
RÍKISKASSTA					
ÚTLENDSKIR PENINGASTOVNAR					

Víðmerkjast skal, at 15 mio. kr. eru afturfluttar úr ábyrgdarrumminum. Hetta upphæddi er inntøkuført undir aðrar inntøkur.

Viðvíkjandi rakstrarútreiðslunum, so er hesar 10 mió. kr. hægri enn mett vað í fíggjarlógini. Rakstrarútreiðsluøkingin er innan høvuðsøkini Samferðslu- og Samskifti, Útbúgving og Grausking, Fiskivinnu, Sigling o.t. og innan Vinnulív og Arbeiðsmarkanað.

Tíverri eru tað enn stovnar, sum ikki taka fígggjar lógarstýringina í nóg stóum álvara. Her kunnu sum døki nevnast »Strandfaraskip landsins, Postverkið, Føroya Studentaskúli, Matrikkulstovan og Serforsørgin«. Av Stuðulsjáttanum, sum eisini hava trupulleikar at leggja tetlan, kunnu nevnast Inntøkutrygd hjá fiskimonnum, Íløgustuðulin og Stuðul til nýggja vinnu.

Hin vegin so síggja vit, at í høvuðsheitum halda almennu stovnarnir játtanina. Meirútreiðslan er hóast alt minni enn 0,4%. Men uppaftur svárari er tað fyri stovnsleiðarar og starvsfólk, sum veruliga leggja orku í at halda játtanina, at tað framvegis eru nakrir, tíbetur fáir, sum ikki taka uppgávuna í nóg stórum álvara.

Eisini er tað ávikavist, at stovnsleiðatat bert lata standa til taka ikki neyðugu stigini m.a. at skøkja landsstýrið um eykajáttan.

Í hesum sambandi skal eisini nevnast, at tað í sambandi við samtyktina av fíggjarlógini liggja nakrar fortreytir um t.d. tiltøk, ið skulu fremjast, men sum síðani vísir seg ongantíð verða framd.

Men samanumtikið má sigast, at gongdin við fíggjarlógini hesi seinastu árini rættiliga ber á rætta borðið.

<u>Viðmerkingar til tey einstøku rakstrarstøini:</u>

Rakstrarstað 1201 Vanligur landsskattur.
Fyribilsskatturin í 1995 verður framroknaðður til 740 mió. kr.. Harafturat eru 42 mió. kr. av litið innkravdar fyri 1994 í fyribilsskatti. Hesar verða bókaðar á 1995. Harumframt skulu frároknast 5,5 mió. kr. vegna úrslitaleysa innheinta, og 0,5 mió. vegna eftirgevigar. Inntøkan kann tí metast itl umleið 775 mió. kr..
Rakstrarstað 2022/23934 Endurgjald fyri tollavgjøld og mvg.
Loranstøðin á Eiði hevur søkt um at fáa endurgoldið tollgjøld og meirvirðisgjald, sum teir annars áttu at goldið av rakstrinum av støðini.
Lansstýrið hevur fyri sí part játtað, at Loranstøðin fær soma sømdir sum flogvøllurin í Vágum. Tað vil siga fær endurgoldið innflutningsmeirvirðisgjaldið og toll- og punktgjøld av tí teir brúka á støðini, og Toll- og skattstova Føroya umsitur skipanina.

Skotið verður upp, at seta kr. 100.000,- av til á eykafíggjarlógina fyri 1995 til endamálið.
Hetta er ein undirkonto til rakstarstað 2022 meirvirðisgjald.

Rakstrarstað 9015 Peningur inntøkuførdur úr Árbyrgdargrunninum.
Sambært løgringslóg nr. 109 frá 29. juni 1995 um broyting í løgtingslóg um ábyrgdargurun skulu tær 15 milliónirnar í Ábyrgdargrunninum flytast aftur í landskassan.

Rakstrarstað 10106 Løgtingsbygningur.
Játtanin til á fíggjarløgtingslógini fyri 1995 til løgtingsbygningin var kr. 774.00,-.
Í árinum eru gjørdar fløgur í EDV-tól fyri kr. 338.000,- uppá kr. 338.000,-. Eykajáttan er fingin til endamálið.
Samlaða játtanin er fingin til endamálið.
Samlaða játtanin í 1995 til løgingsbygningin verður kr. 1.112.000,-.

Rakstrarstað 10158 Løgtingsskrivstovan.
Játtanin á fíggjarlógini fyri 1995 til løgtingsskrivstovuna var kr. 2.593.000,-.
Lønarspuringarnar vegna verkfallið vóru kr. 64.000,-.
Sostatt er samlaða játtanin til løgtingsskrivstovuna í 1995 kr. 2.529.00,-.

Rakstrarstað 10177 Løgtingsins umboðsmaður.
Játtanin á fíggjarløgtingslógini til løgtringsins umboðsman í 1995 var kr. 300.000,-, men peningurin verður ikki nýttur.

Rakstrarstað 10403 Grannskoðan (intern).
Játtanin á fíggjarløgtingslógini fyri 1995 til intern grannskoðan var kr. 2.800.000,-.
Lønarsparingin vegna verkfallið var kr. 76.000,-.
Sostatt er samlaða játtanin til interna grannskoðan í 1995 kr. 2.724.000,-.

Rakstrarstað 11053 Landsskrivstovan.
Á fíggjarløgtingslógini fyri 1995 var játtanin til landsskrivstovuna kr. 15.500.000,-. Lønarsparingin vegna verkfallið var kr. 424.000,-.
Eykajáttan er givin í árinum uppá kr. 1.222.000,- til landsskrivstovuna frá rakstrarstað 11034 kanning av almenna sektorinum í sambandi við at 4 fólk skulu setast á búskapardeildini til arbeiðið við fíggjarlógini.
Samlaða játtanin til landsskrivstovuna verður sostatt í 1995 kr. 16.298.000,-.

Rakstrarstað 11034 Kanning av almenna sektorinum.
Á fíggjarlógini 1995 vóru játtaðar kr. 2.500.000 til kanning av almenna sektorinum.
Burturav hesum er við eykajáttan, sum er givin í árinum, flutar kr. 1.222.000 til rakstrarstað 11053 landsskrivstovan.

Rakstrarstað 11090 Fyrisitin av undirgrund.
Játtanin á fíggjarlógini fyri 1995 til fyrisiting av undirgrund var kr. 3.020.000,-.
Lønarsparingarnar vegna verkfallið vóru kr. 14.000,-.
Roknað verður við eitt meirnýtslu á rakstrarstaðið, sum stavar frá at forkanningarvirksemi á føroyska økinum hevur verið nunandi meira umfatandi enn roknað við.
Hetta hevur so aftur fört við sær, at arbeiðið á myndugleikasíðuni er økt serliga hvat viðvíkur konsulenthjálp til tulkingar av innkomna tilfarinum.
Skotið er orðin upp at játta kr. 200.000,- á eykafíggjarlógini fyri 1995, soleiðis at samlaða játtanin til fyrisiting av undirgrund í 1995 verður kr. 3.206.000,-.

Rakstrarstað 11262 Toll- og skattstova Føroya.
Játtanin á fíggjarlógini fyri 1995 til Toll- og skattstovuna var kr. 52.424.000,-.

Rakstrarstað 11307 Landsfólkayvirlitið.
Játtanin á fíggjarløgtingslógini fyri 1995 til landsfólkayvirlitið var kr. 997.00,-.
Lønarsparingarnar vegna verkfallið vóru kr. 10.000,-.
Samlaða játtanin í 1995 til landsfólkayvirlitið er sostatt kr. 987.000,-.

Rakstrarstað 11359 Almannastovan.
Játtanin á fíggjarlógini 1995 til Almannastovuna var kr. 18.800.000,-. Lønarsparingarnar vegna verkfallið vóru kr. 545.286,-. Haraftirat eru kr. 80.000,- flutar til rakstrarstað 19436 Umsiting av hjálpitólum.
Samlaða nýtslan í 1995 á Almannastovuni verður væntandi kr. 18.174.714,-. Tað er sostatt ein minninýtsla uppá kr. 625.586,-.

Rakstrarstað 11409 Landsskúlafyrisitingin.
Játtanin á fíggjarløgtingslógini fyri 1995 til lansskúlafyrisitingina var kr. 8.612.000,-.
Lønarsparingarnar vegna verkfallið vóru kr. 178.000,-.
Samlaða játtanin í 1995 til landsskúlafyrisitingina er sostatt kr. 8.484.000,-.

Rakstrarstað 11414 Stuðulsstovan.
Játtanin á fíggjarløgtingslógini fyri 1995 til stuðulsstovuna var kr. 1.080.000,-.
Lønarsparingarnar vegna verkfallið vóru kr. 33.00,-.
Samlaða játtanin til stuðulsstovuna í 1995 er sostatt kr. 1.047.000,-.

Rakstrarstuð 11452 Føroya Gjaldstova.
Játtanin á fíggjarløgtingslógini fyri 1995 til Gjaldstovuna var kr. 11.343.000,-.
Lønarsparingarnar vegna verkfallið vóru kr. 237.000,-.
Samlaða játtanin til gjaldstovuna í 1995 er sostatt kr. 11.106.000,-.

Rakstrarstað 11604 Valuta- og prísráð.
Játtanin á fíggjarlógini til valuta- og prísráðið var kr. 863.000,-.
Lønarsparingarnar vegna verkfallið vóru kr. 31.000,-.
Samlaða játtanin til valuta- og prísráðið er sostatt kr. 832.000,-

Rakstrarstað 11758 Ferða- og dagpeningur uttanlands.
Landsskrivstovan kemur at brúka umleið kr. 400.00,- meira enn roknað var við til rakstrarstað 11758 Ferða- og dagpeningur uttanlands.
Orsøkirnar til økta ferðaaktivitetin eru serliga hesar:
Nevndin, sum var sett at kaun betur markanðaratgongd til ES hevur verið nakrar kanningarferðir og hevur sambandið annars við Bryssel og ES verið nógv størri í 1995 enn árini frammandundan. Haraftrat hava verið eykafundir í t.d. NAFO. Sonnuleiðis er stovnurin undir umskipan, og er samskiftið við umheimin vaksið. Hinvegin eru tað einstakir stovnar, sum ikki brúka alla kvotu sína og er tí «bert» neyðurt við kr. 300.000,- eyka.
Skotið verður upp at játta kr. 3.300.000,-.

Rakstrarstað 11808 Innheintinagarútreiðslur.
Játtanin á fíggjarlógini fyri 1995 til Innheintingarútreiðslur var kr. 500.000,-.
Lønarsparingin vegna verkfallið var kr. 11.000,-.
Samlaða játtanin til innheintingarútreiðslur í 1995 er sostatt kr. 489.000,-.

Rakstrarstað 11898 Matrikulstovan.
Á fíggjarløgtingslógini 1995 vóru játtaðar kr. 4.240.000,-.
Lønarsparingin vegna verkfallið var kr. 189.000,-.
Játtanin til Matrikulstovuna í 1995 er sostatt kr. 4.05.000,-.Men meting matrikulstovunar er, at meirnýtslan í 1995 verður kr. 1.100.000,-.
Roynt hevur verið at skorið útreiðslurnar niður. Millum annað eru 6 fólk uppsogd, men henda sparing vikr ikki enn; mett verður, at hetta fer at gera, at matrikulstovan komandi ár fer at halda játtanina.
Skotið verður upp, at játta meirnýtsluna uppá kr. 1.100.000,- á eykafíggjarlógini fyri 1995, soleiðis at samlaða játtanin í 1995 til matrikulstovuna verður kr. 5.151.000,-.

Rakstrarstað 11901 Landsverkfrøðingasstovan.
Játtanin á fíggjarlógini fyri 1995 til landsverksfrøðingsstovuna var kr. 8.260.000,-.
Lønarsparingin vegna verkfallið var kr. 281.000,-.
Samlaða játtanin til landsverkfrøðingsskrivstovuna í 1995 ersostatt kr. 7.979.000,-.

Rakstrarstað 11991/203507 Umboðan.
Játtanin á fíggjarlógini fyri 1995 til umboðan var kr. 800.000,-.
Tørvur er á eini játtan aftrat uppá kr. 450.000,- á eykafíggjarlógini fyri 1995.
Orsøkin til hesa umsókn er, at drotningin hevur verið á vitjan jí ár, og visti lansstýrið ikki hetta, tá fíggjarætlanin var gjørd. Kostnaðurin av drotningavitjanini er ghordur upp til kr. 475.000,-.
Skotið verður upp at játta kr. 450.000,- á eykafíggjarlógini fyri 1995 til umboðan, soleiðis at samlaða játtanin í 1995 verður 1.250.000,-.

Rakstrarstað 119917373305 Aðrarútreiðslur.
Í sambandi við innsavningina til Suðavík stuðlaði landsstýrið og løgtingið við kr. 300.000,-. Eykajáttan er fingin í árinum til endamálið.
Landsstýrið hevur á fundi 23. november 1995 samtykt saman við løtinginum at stuðla innsavningina í sambandi við vanlukkuna á Flateyri. Skotið verður upp, at játta á eykafíggjarlógini fyri 1995 kr. 300.000,- til endamálið.
Haraftrat verður ein meirnýtsla uppá kr. 400.000,- serliga grundað á, at útreiðslurnar í sambandi við marknaðrtraetuna við Bretland hava verið størri enn roknað var við, og at hædd ikki var tikin fyri útreiðslunum til nevndararbeiði til ES álitið.
Skotið verður upp eisini at játta kr. 400.000,- á eykafíggjarlógini fyri 1995 til omanfyrinevndu meirnýtslu, soleiðis at samlaða játtanin á rakstrarstað 11991/373305 í 1995 verður kr. 2.500.000,-.

Rakstrarstað 12007 Sjúkrakassar.
Játtanin á fíggjarlógini fyri 1995 til Sjúkrakassar var kr. 16.000.000,-.
Vanligi landskassastudningurin fyri 1995 verður kr. 14.016.000,-. Landsstýrið hevur, við loyvi frá fíggjarnevndini, avgjørt, at hækka C-limagjaldið í sjúkrakassunum úr kr. 48,- til kr. 600,- frá 1. januar 1993. Av tí at hetta ikki er lýst sum kunngerð, hava sjúkrakassarnir ikki havt heimild at innkrevja tað hækkaða gjaldið. Sjúkrakassarnar eru komnir við einari uppgerð, havt hetta mistam hevur kostað teimum. Gjaldstovan skuldi gera tað endaligu uppgerðina. Henda uppgerð fyriliggur ikki enn, men metir Almanna- og heilsudeildin, at henda upphædd verður umleið kr. 2,7 mió. kr. Hækkaða C-limagjaldið er lýst sum kunngerð galdandi frá 1. januar 1995.
Skotið verður upp at játta kr. 800.000,- á eykafíggjarlógini 1995 til endamálið.
Samlaða nytslan til sjúkrakassarnar verður sostatt kr. 16.800.000,- í 1995.

Rakstrarstað 12109 Landssjúkrahúsið.
Játtanin á fíggjarlógini 1995 til Landssjúkrahúsið var kr. 208.398.000,-. Lønarsparingin vegna verkfallið var kr. 789.000,-. Samlaða játtanin til Landssjúkrahúsið í 1995 er sostatt kr. 207.609.000,-.
Sum nú er, sær út til, at Landssjúkrahúsið við verandi gongd kann hava minninýtslu uppá kr. 2,0 mió. kr., ið tó verður mátsvarað av, at starvsfólkini hava umleið 2,0 mió. kr. til góðar í uppspardum tímu. Flestu starvsfólini vilja heldur hava peningin tilgóðar fyri seinni at kunna avspáka.
Hetta verður í fyrstu syftu viðmerkt í sambandi við uppskotið til eykafíggjarlóg við atliti til ætlan um aftaná 15. februar 1996 á omanfyrinevnda grundarlag, at søkja fíggjarnevndina um eykajáttan til Landssjúkrahúsið í 1996.

Rakstrarstað 12202 Klaksvíkar Sjúkrahús.
Játtanin á fíggjarløgtingslógini fyri 1995 til Klakdsvíkar sjúkrahús var kr. 37.864.000,-.
Sparingin vegna verkfallið var kr. 51.000,-. Samlaða játtanin til Klaksvíkar sjúkrahús í 1995 er sostatt kr. 37.813.000,-.

Rakstrarstað 12304
Játtanin á fíggjarløgtingslógini fyri 1995 til Suðuroyar sjúkrahús var kr. 24.938.000,-.
Lønarsparingin vegna verkfallið var kr. 40.000,-.
Samlaða játtanin til Suðuroyar sjúkrahús í 1995 er sostatt kr. 24.898.000,-.

Rakstrarstað 12907/303344 Hvíldarheimið Naina.
Í 1994 varð landsstýrið varugt við, at hvíldarheimið »Naina« hevði fingið av nógvan pening útgoldnan. Sambært løgtingslóg nr. 18. frá 9. apríl 1964 kann raksturin av hvíldarheiminum í prinsippinum ikki geva avlop. Rakstraravlopið kemst av eini missskiljing millum Foroya Landsstýrið og Føroya Gjaldstovu. Bæði landsstýrið og kommunurnar hava goldið og nógv. Kommunurnar eru góðskrivaðar teirra upphædd. Hvíldarheimið hevði nýtt ein part av tí innistandandi peninginum til umbygging. Landsstýrið hevur ikki formliga góðkent umbygginginu, men varð kunnað um hana so við og við í sambandi við uppskot til fíggjarætlanir, tí uttan at nakað tá varð gjørt við málið.
Landsstýrið hevur á findi tann 7. novembrt 1995 samtykt, at søkja fíggjarnevndina um eina eykajáttan uppá kr. 774.164,-.
Skotið verður upp at játta kr. 774.164,- á eykafíggjarlógini fyri 1995, soleiðis at samlaða játtanin til Hvíldarheimið Naina í 1995 verður kr. 2.175.000,-.

Rakstrarstað 13265 Strandferðsla Landsins.
Játtanin á fíggjjarlígini fyri 1995 til Strandferðsluna var kr. 46.000.000,-.
Meting strandferðslunnar - frundaðar á fyrra hálvár og fram til september - hava verið, at játtanin fór at halda hóast bakkøst longu í vár, og fyrivarni tá var tikið fyri (verkfalli, rentuútreiðslum, lokan av stevninum á Smyrli).
Í heyst hevur ginigð óvanliga illa í bond. Teistin breyt ein hovuðsmotor. Beinleiðis útreiðslan av hesum verður netto fram ímóti trimum mió. kr., og útreiðslu og inntøkumissur í hesum sambandi fer upp um millióninna, so her er talan um ein samlaðan miss í mistum inntokum og øktum útreiðslum uppá umleið 3,8 mió. kr.
Eitt annað, sum uppá sikt er ein størri trupulleiki, er, at hóast Strandferðslan økti tænastustøðið fyrrr í ár við nýggja ferðaætlanini, so eru innøkurnar av ferðaseðlasoluni innlendis stagneraðar.
Økingin bleiv gjørd í teiir trúgv, at virksemið í samfelagnum og ferðingin fór at økjast. Hetta seinna er so

ikki hent.
Skotið verður upp. at seta meirnýtsluna kr. 3.798.000,- á eykafíggjarlógina fyri 1995.
Í sambandi við framhald av serflutningsskipan fyri rørslutandað í Tórshvn, hvor Strandferðslan í árinum fingið eina eykajáttna uppá kr. 103.000,- fyri útreiðslurnar í 1994, og umsókn erkomin til landsstýrið um eykajáttan fyri útreiðslunum í 1995 uppá kr. 100.250,-.
Skotið verður upp at játta kr. 100.250,- á eykafíggjarlógini fyri 1995 til serflutnigsskipanina.
Við eini dykajáttan uppá kr. 4.001.25550,- tilsamans verður samlaða játtanin til Strandferðsluna at verða kr. 50.001.000,-.

Rakstrarstað 13089 Postverk Føroya.
Játtanin á fíggjarlógini fyri 1995 var kr. 1.000.000,-.
Lønarsparingin vegna verkfallið var kr. 1.000.000,-.
Sostatt verður játtanin á fíggjarlóginin fyri 1995 kr. 0,00 til Postverk Føroya.
Í rakstraraetlanini fyri 1995 varð roknað við einum yvirskotið frá frímerkjadeildini uppá 7,8 mió. kr. Men ivi er, um hvussu stór henda søla verður í á.
Meting postverksinis er, at tørvur verður á eini eykajáttan í 1995 uppá kr. 4.000.000,-.

Skotið verður nupp at játta kr. 3.000.000,- á eykafíggjarlógini fyri 1995, soleiðis at samlaða játtanin til Postverk Føroya í 1995 verður kr. 4.000.000,-.

Rakstrarstað 13056 Fyritøkur og útgerð hjá landsverkfrøðinginum.
Spardu lønarútreiðslurnar vegna verkfallið hjá landsverkfrøðinginum á grein 13 vóru kr. 406.000,-.
Allur peningurin er sostatt settur á eykafíggjarlógina undirrakstrarstað 13056.

Rakstrarstað 14103 Fólkaskúlin.
Játtanin til fólkaskúlan á fíggjarlógini 1995 var kr. 130.163.000,-.
Á Eysturskúlanum, Skúlanum á Leiti og í Tofta Skúla eru ymiskar ábøtur gjørdar, til tess at rørslutarnaðir næmingar kunnu ganga í skúlunum. Stuðulin til kommunurnar svarar til í mesta lagi 50% av mettu útreiðslunum.
Í fíggjarárinum er eykajáttan uppá kr. 115.695 veitt til endamálið, soleiðis at samlaða játtanin til fólkaskúlan í 1995 verður kr. 130.278.000,-.

Rakstrarstað 14136 Skúlabarnaflutningur:
Játtanin á fíggjarløgtingslógini fyri 1995 til skúlabarnaflutning var kr. 1.500.000.
Men landsskúlaráðið avgjørdi á fundi 12. mai 1993 at lækka stuðulin til skúlabarnaflutning úr 50% niður á 30% í skúlaárinum 1992/1993. Avgerðin var løgfrøðiliga skeiv, tí eftir lógini skulu útreiðslurnar býtast helvt um helvt millum landskassan og kommunurnar, og gav landsstýrið tessvegna Føroya Kommunufelag viðhald í kæru teirra í hesum máli.
Landsstýrið hevur fyri sí pert tikið undir við, at eykajáttan verður veitt til meirnýtsluna uppá kr. 742.500.
Skotið verður upp at játta kr. 742.500,- á eykafíggjarlógini fyri 1995, soleiðis at samlaða játtanin til skúlabarnaflutning í 1995 verður kr. 2.243.000,-.

Rakstrarstað 14205 Suðuroyardepilin:
Játtanin á fíggjarlógini fyri 1995 til Suðuroyðardepilin var kr. 4.500.000.
Í fíggjarlógaruppskoti landsstýrisins fyri 1995 til Suðuroyardepilin uppá kr. 4.500.000,-, varð ikki roknað við uppøku av næmingum innan fiskivinnu- og handilsútbúgvingum á skúlanum.
Løgtingið samtykti at eingir skúlar skuldu flytast í fíggjarátinum, men játtaði bert kr. 4.500.000,- á fíggjarlógini fyri 1995.
Sostantt skuldu næmingar takast inntil hesa útbúgvingar í skúlaárinum 1995/1996- treytað av, at nóg nógvir næmingar teknaðu seg. Peningurin var játtaður til ein FHS-flokk, tí nóg nógvir næmingar hovdu teknað seg. Tá skúlaárið byrjaði, vóru teir flestu næmingarnir farnir í aðarar skúlar, og flokkurin varð av ongum. Peningurin verður tískil ikki nýttur til endamálið.
Skotið verður tí upp at strika tan 250,00 kr..
Sparingin í lønum vetna verkfallið var kr. 40.000.
Samlaða játtanin til Suðuroyardepilin verður sostantt kr. 4.460.000 í 1995.

Rakstrarstað Fiskiídnaðardkúli í Norðstreymi.
Játtanin á fíggjarlógini fyri a995 til Fiskiídnaðarskúlan í Norðstreymi var kr. 2.563.000,-.
Lønarsparingin vegna verkfallið var kr. 25.000,-.
Samlaða játtanin til Fiskiídnaðarskúlan í Norðstreymi í 1995 er sostatt kr. 2.538.000,-.

Rakstrarstað 14307 Tekniski skúli í Klaksvík.
Játtanin á fíggjarlógini 1995 til Tekniska skúla í Klaksvík var kr. 9.620.000.
Skúlin hevur fingið eina eykajáttan í fíggjarárinum uppá kr. 234.538.
Orsøkin er, at dómur er sagdur í Føroyar rætti 21.03.1995, har Tekniski skúli í Klaksvík er dømdur at gjalda kr. 299.348.
Saksøkjarin Jógvan Mortensen, byggimeistari hevði ein meirkostnað uppá kr. 576.068 av byggingini av 2. byggistigi av skúlanum, sum hann kravdi at fáa frá saksøkta - Tekniska skúlanum í Klaksvík.
Dómurin gav saksøkjaranum partvíst viðhald.
Samlaða játtanin til Tekniska skúla í Klaksvík er sostatt kr. 9.854.538 í 1995

Rakstrarstað 14331 HF í Klaksvík.
Játtanin á fíggjarlógini 1995 til HF í Klaksvík var kr. 1.500.000.
Uppskot landsstýrisins var at játta kr. 1.500.000,- á fíggjarlógini fyri 1995, og at nýggir næmingar ikki skuldu verða upptiknir skúlaárið 1995/96 í Klaksvík, tí flokkurin í staðin skuldi flytast til Kambsdal.
Løgtingið samtykti at eingi skúlar skuldu flytast í fíggjarárinum, men fáttaðu bert kr. 1.500.000,- á fíggjarlógini 1995 til HF í Klakdsvík.
Tesvegna verð fíggjartørvurin hjá Klaksvíkar HF skeiðið kr. 550.000 afturat.
Skúlin hevur í Fíggjarárinum fingið eina eykajáttan til endamálið uppá kr. 550.000.
Sparingin í lønum vegna verkfallið var kr. 28.000.
Samlaða játtanin í 1995 til HF skeiðið í Klaksvík verður sostatt kr. 2.072.000.

Rakstrarstað 14364 Eysturoyar studentaskúli og HF.
Játtanin á fíggjarløgtingslógini fyri 1995 til Eysturoyar studentaskúla- og HF var kr. 10.580.000,-.
Lønarsparingin vegna verkfallið var kr. 137.000,-.
Samlaða játtanin í 1995 til Eysturoyar Studentaskúla- og HF er sostatt kr. 10.443.000,-.

Rakstrarstað 14378 Føroya Studentaskúli og HF:
Játtanin til Føroya Studentaskúla og HF á fíggjarlógini 1995 kr. 21.124.000.
Lønarsparingin vegna verkfallið var kr. 278.000,-.
Fyritreytirnar, sum fíggjarlógaruppskotið fyri 1995 bygdi á, hava ikki hildið, og hevur skúlin sum heild undirmett útreiðslurnar.

Undirvísingarútreiðslurnar gjørdust væl størri enn mett varð.
1) Nýggjur sáttmáli varð undirskrivaður millum landsstýrið og Yrkisfelag Studenta- og HF- lærara, við gildi heilt aftur til 1. mars 1995. Samsýningin fyri rætting av uppgávum o.t. okist tessvegna. 2) Nýggja studentaskúlaskipanin kom í gildi, við fleir valmoguleikum hjá studentunum. Samlaða tímatalið um vikuna gjørdist við hesum 64 tímar hægri enn mett. 3) Frítíðarískoyti og 4) Starvsfókagjøld vóru undirmett.

Støðuútreiðslurnar, serliga tryggingargjaldið gjørdist eitt sindur hægri enn mett.

Mett verður, at neyðugt verður við eini fáttan á eykafíggjarlógini fyri 1995 uppá kr. 1.372.000,-.
Skotið verður upp at átta kr. 1.3.72.000,- á eykafíggjarlógini 1995, soleiðis at samlað fáttanin til Føroya Studentaskúla í 1995 verður kr. 22.496.000.

Rakstrarstað 14409 Føroya Handilsskúli:
Játtanin til Føroya Handilsskúla var á fíggjarlógini 1995 kr. 16.387.000.
Føroya Handilsskúli hevði størri fíggjartørv í 1995 enn landsskúlafyrisitingin metti, tá fíggjarætlanin varð løgd. Læraratímasatsurin var ov lágt settur, tíatalið hægri og útboðið av vallærugreinum eitt sindur størri enn mett varð.
Føroya Handilsskúli hevur í fíggjarárinum fingið eina eykajáttan uppá kr. 850.000 til endamálið.

Samlaða játtanin til Føroya Handilsskúla í 1995 er sostatt kr. 17.237.000.

Rakstrarstað 14414 Teknisk skúli í Tórshavn.
Játtanin á fíggjarlogtingslógini fyri 1995 til Tekniska skúla í Tórshavn var kr. 12.000.000,-.
Lønarsparingin vegna verkfallið var kr. 80.000,-.
Samlaða játtanin til Tekniska skúla í Tórshavn í 1995 er sostatt kr. 11.920.000,-.

Rakstrarstað 14428 Lærarráð Føroya.
Játtanin á fíggjarlogtingslógini fyri 1995 til Lærarráð Føroya var kr. 4.094.000,-.
Lønarsparingin vegna verkfallið ver kr. 9.000,-.
Samlaða játtanin til Lærarráð Føroya í 1995 er sostatt kr. 4.085.000,-.

Rakstrarstað 14466 Føroya Sjómansskúli.
Játtanin á fíggjarlógini fyri 1995 Føroya Sjómansskúla var kr. 7.123.000,-.
Lønarsparingin vegna verkfallið var kr. 9.000,-.
Samlaða játtanin til Føroya Sjómansskúla í 1995 er sostatt kr. 7.114.000,-.

Rakstrarstað 14471 Føroya Maskinskúli.
Játtanin á fíggjarlógini fyri 1995 til maskinskúlan var kr. 6.000.000,-, men roknað verður við, at nýtslan í 1995 verður kr. 6.150.000,-.
Meirnýtslan uppá kr. 150.000,- stendst av, at skúlin er flutur í árinum.
Skotið verður upp at játta kr. 150.000,- á eykafíggjarlógini fyri 1995, soleiðis at samlaða játtanin í 1995 til maskinskúlan verður kr. 6.150.000,-.

Raksrarstað 14554 Fróðskaparsetur Føroya.
Játtanin á fíggjarlógini fyri 1995 til Fróðskaparsetur Føroya var kr. 9.700.000,-.
Lønarsparingin vegna verkfallið var kr. 262.000,-.
Samlaða játtanin til Fróðskaparsetrið í 1995 er sostatt kr. 9.438.000,-.

Rakstrarstað 14587 Seismiskar kanningar.
Játtanin á fíggjarløgtingslógini fyri 1995 til seismiskar kanningar var kr. 450.000,-.
Uttanlandsvevnd løgtingsins hevur heitt á jarðfroðissavnið um at útvega og tulka seismiska kanningartilfarið frá »hvíta økinum« millum Føroyar og Stórabretland.

Seismiskar kanningar eru gjørdar á hesum økt seinastu árini, og er ætlanin, at Jarðfroðisavnið skal keypa upptøkutilfarið, sum skal stuðla okkara kunnleikagrundarlag á økinum.
Møguliga kann kanningartilfarið fáast bíligari, og um so verður, minkar tann upphæddin, sum keypir av alfur til landskassan. Skotið verður upp at áta kr. 1.700.000,- á eykafíggjarlógini fyri 1995, soleiðis at samlaða játtanin til eismiskar kannigar í 1995 verður kr. 2.150.000,-.

Rakstrarstað 14592 Biofar - projektið.
Játtanin á fíggjarløgtingslógini fyri 1995 til Biofar - projektið var kr. 650.000,-.
Lønarsparingin vegna verkfallið var kr. 11.000,-.
Samlaða fáttanin til Biofar - projektið í 1995 er sostatt kr. 639.000,-.

Rakstrarstað 14689 Stuðul til musikkskúlar.
Játtanin á fíggjarløgtingslógini fyri 1995 til musikkskúlar var kr. 3.822.000,-.
Lønarsparingin vegna verkfallið var kr. 5.000,-.
Samlaða játtanin í 1995 til musikkskúlar er sostatt kr. 3.817.000,-.

Rakstrarstað 14827 Landsmiðstøð fyri undirvísingarambað.
Játtanin á fíggjarløgtingslógini fyri 1995 til Landsmiðstøðina fyri undirvísingarambað var kr. 2.646.000,-.
Lønarsparingin vegna verkfallið var kr. 23.000,-.
Samlaða játtanin til Landsmiðstøðina fyri undirvísingarambað í 1995 er sostatt kr. 2.623.000,-.

Rakstrar 14846 Skúlabókaútgáva.

Játtanin á fíggjarløgingslógini fyri 1995 til Skúlabókaútgávu var kr. 3.669.000,-.
Lønarsparingin vegna verkfallið var kr. 22.000,-.
Samlaða játtanin til skúlabókaútgávu í 1995 er sostatt kr. 3.647.000,-.

Rakstrarstað 14972/313646 Næmingaheim rakstrarstuðningur:
Játtanin á fíggjarløgtingslógini fyri 1995 til næmingaheim er kr. 389.000.
Næmingaheimið undir Fjalli hevur av misgávum ikki fingið rakstrarstuðul á eykafíggjarlógini fyri 1994 eins og hini næmingaheimini fyri árini 1991 og 1992. Tessvegna verður peningur settur av á eykafíggjarlógini fyri 1995, sum svarar til 50% av rakstrarútreiðslunum fyri hesi ár.
Eykajáttan uppá kr. 318.000 er veitt í árinum til endamálið.
Samlaða játtanin til næmingaheim í 1995 verður sostatt kr. 707.000.

Rakstrarstað 1148895/313829 Viðlíkahald annars.
Á fíggjarløgtingslógini fyri 1995 var áttað kr. 900.000,-.
Men av tí, at HF-skeiðið í Klaksvík ikki varð flutt, sum fyrr ætlað, var neyðugt at skifta vindeygum. Tí verður skotið upp, at játta kr. 86.000,- á eykafíggjarlógini fyri 1995 til viðlíkahald annars á skúlaskipum og taka peningin av rakstrarstað 18983/353983 Føroya Brandskúli.
Samlaða játtanin til rakstrarstað 1148895/313829 viðlíkahald annars verður sostatt kr. 986.000,-.

Rakstrarstað 15109 Føroya Landsbókasavn.
Játtanin á fíggjarløtingslógini fyri Føroya Landsbókasavn var kr. 4.250.000,-.
Lønarsparingin vegna verkfallið var kr. 147.000,-.
Samlaða játtanin til Føroya Landsbókasavn í 1995 er sostatt kr. 4.103.000,-.

Rakstrarstað 15304 Landsskjalasavn.
Jaáttanin á fíggjarløgtingslógini fyri 1995 til Landsskjalasavnið var kr. 1.974.000,-.
Lønarsparingin vegna verkfallið var kr. 71.000,-.
Samlaða játtanin til Landsskjalasavnið í 1995 er sostatt kr. 1.903.000,-.

Rakstrarstað 15406 Foroya Fornminnisavn.
Játtanin á fíggjarløgtingslógini fyri 1995 til Foroya Fornminnisavn var kr. 4.723.000,-.
Lønarsparingin vegna verkfallið var kr. 110.000,-.
Samlaða játtanin til Føroya Fornminnisvn í 1995 er sostatt kr. 4.613.000,-.

Rakstrarstað 15615 Sjónvarp Foroya.
Játtanin á fíggjarløgtingslógini fyri 1995 til Sjónvarp Foroya var kr. 1.000.000,-
Lønarsparingin vegna verkfallið var kr. 266.000,-.
Samlaða játtanin til Sjónvarpið í 1995 er sostatt kr. 734.000,-.

Rakstrarstað 15703 Náttúrugripasavn.
Játtanin á fíggjarløgtingslógini fyri 1995 til Náttúrugripasavnið var kr. 3.451.000,-.
Lønarsparingin var kr. 120.000,-.
Samlaða játtanin til Náttúrugripasavnið í 1995 er sostatt kr. 3.331.000,-.

Rakstrarstað 15881 Mál- og navnanevndin.
Játtanin á fíggjarløgtingslógini fyri 1995 til Mál- og navnanevndina var kr. 320.000,-.
Lønarsparingin vegna verkfallið var kr. 11.000,-.
Samlaða játtanin í 1995 til Mál- og navnanevndina er sostatt kr. 309.000,-.

Rakstrarstað 16302 Vaktar- og hjargingartænastan.
Játtanin á fíggjarløgtingslógini fyri 1995 til vktar- og hjargingartænasturna vegna verkfallið var kr. 132.000,-.
Játtanin er sostatt kr. 15.968.000,-.

Vaktar- og hjargingartænastan hevur í árinum fingið eina eykajáttan uppá kr. 150.000,- sum Vaktar- og hjarg-

ingartænastan skal gjalda fyri framhaldandi innsavning av veðurtíðindum frá teimum nú partvíst ómannaðu vitaplássunum í Føroyum.

Vaktarskipið Ólavur Halgi var til árligt eftirlit á Skála Skipasmiðju, har óvætað varð kravt størri umvæling og at motorin sundur.
Málið er samtykt á landsstýrisfundi og sent fíggjarnevndini, sum hevur sent málið aftur vísandi til § 44, stk. 2 í stýrisskipanarlógini.
Vakta- og bjargingartænastan upplýsir, at peningur ikki er tøkur til hetta eykaarbeiðið, sum verður mett til kr. 300.000,-. Skotið verður tí upp at játta tær kr. 300.000,- til endamálið á eykafíggjarlógini fyri 1995, soleiðis at samlaða játtanin ti Vaktar- og bjargingartænastuna fyyri 1995 verður kr. 16.418.000,-.

Rakstrarstað 16386 Sjóvinnufyrisiting & Skráseting Føroya.
Játtanin á fíggjarløgtingslógini fyri 1995 til Sjóvinnufyrisitingin & skráseting Føroya var kr. 1.500.000,-.
Lønarsparingin vegna verkfallið var kr. 29.000,-.
Samlaða játtanin til Sjóvinnufyrisiting & Skráseting Føroya í 1995 er sostatt kr. 1.471.00,-.

Rakstrarstað 16436 Inntøkutrygd hjá fiskimonnum.
Á fíggjarlógini fyri 1995 var játtað kr. 90.000.000,- til inntøkutrygd hjá fiskimonnum.
Undir arbeiðinum við uppskotinum til játtna til inntøkutrygd fyri 1995 varð roknað við, at játtanin skuldi verða umleið kr. 100.000.000,-, tað sama sum kostnaðurin av inntøkutrygdini var í 1994. Játtanin varð sett til 90 mió. kr. við tí viðmerking at broytingar skuldu gerast í skipanini við inntøkutrygd. Eingin broyting er gjørd í 1995, og tí verður kostnaðurin umleið tann sum upprunaliga varð roknað við.

31. oktober 1995 vórðu 77,7 mió. kr. útgoldnar av játtanini til inntøkutrygd fyri 1995. Framrokningin bendir á, at útgodnar verða umleið 101 mió. kr. í inntøkutrygd fyri fíggjarárið 1995, ið sostatt gevur ein tørv uppá 11 mió. kr..

Men vegna tað, at útgodnar vórðu 4,3 mió. kr. í minstuløn til útróðrarmenn, sum varð galdandi fram til 28. februar 1995, tá lógin fór úr gildi, vórðu útgjaldingarnar av minstaforvinningi tí ikki so stórar í januar og februar. Hetta gevur eina óvissu í framrokningini av minstaforvinninginum fyri 1995. Mett verður, at óvissu kann verða umleið 1 mió. kr. hvønn vegin.
Skotið verður tí upp, at játtanin til inntøkutrygd hjá fiskimonnum á eykafíggjarløgtingslógini fyri 1995, verður 12 mió. kr., soleiðis at samlaða játtanin til inntøkutrygd hjá fiskimonnum verður kr. 102.000.000,-.

Rakstrarstað 16417 Íløgustuðul.
Á fíggjarlógini 1995 vóru játtaðar kr. 60.000.000,- til íløgustuðul.
Fyri fíggjarárið 1994 vórðu útgoldnar umleið 64 mió. kr. í íløgustuðli.
31. oktober 1995 vórðu útgoldnar umleið 64 mió. kr. í íløgustuðli.
31. oktober 1995 vórðu 50,2 mió. kr. útgoldnar av játtanini til íløgustuðul fyri 1995. Framrokningin bendir á, at útgoldnar verða umleið 67,7 mió. kr. í íløgustuðli fyri fíggjarárið 1995, ið sostatt gevur ein tørv uppá 7,7 mió. kr.. Orsøkin til vøksturin er, at fleiri fiskifær eru í vinnu í ár og at trý skip hava fingið ein part av íløgustuðlinum fyri 1994 útgoldnan av játtanini fyri 1995.
Viðmerkjast skal, at um øll fiski før sum hava fingið játtað íløgustuðul, vóru í vinnu alt árið og hildu treytirnar annars, so hevði útgjaldingin av íløgustuðli fyri fíggjarárið 1995 ligið um 71 mió. kr..
Skotið verður upp at játtaðar verða 8 mió. kr. til íløgustuðul á eykafíggjarlógini fyri 1995, soleiðis at samlaða játtanin í 1995 verður kr. 68.000.000,-.

Rakstrarstað 16519 Fiskirannsóknarstovan.
Játtanin á fíggjarlógini fyri 1995 til fiskirannsóknarstovuna var kr. 6.139.00,-.
Lønarsparingarnar vegna verkfallið vóru kr. 200.000,-.
Landsstýrið hevur samtykt at nýta peningin til endurskoðan av stovnsmetingunum, soleiðis at samlaða játtanin til Fiskirannsóknarstvuna í 1995 verður óbroytt kr. 6.139.000,-.

Rakstrarstað 16607 Fiskivinnuráð.
Játtanin á fíggjarløtingslógini fyri 1995 til Fiskivinnuráðið var kr. 250.000,-.
Lønarsparingin vegna verkfallið var kr. 16.000,-.

Samlaða játtanin til fiskivinnuráðið í 1995 er sostatt kr. 234.000,-.

Rakstrarstað 16904/333224. Lóg nr. 26 um sjúkur hjá fiski og smolt.
Í sambandi við, at furunkulosa varð staðfest 19. august 1991 ávøtnunum í Vestmann, á smoltstøðini p/f North Atlantic Starfish Cooporation v/ John Kjeld, gav landsdjóralæknin boð um, at allur fiskur varð avtikin, og støðin tikin upp, vaskað og turrløgd. Tá útgerðin var av timbri, metti landsdjóraløknin ikki, at henda á tryggjandi hátt kundi sóttreinsast og avgjørdi so, at útgerðin skuldi brennast.
Sakførarin hjá N.A.S.F.C. sendur endurgjaldskrav til landsstýrið, sum endar við, at ein semja verður gjørd, sum báðir partar skriva undir. Sambært semjuni skal landsstýrið endurgjalda N.A.S.F.C. eina upphædd uppá kr. 1.735.000,-. Afturat hesi upphædd koma kr. 35.500,- til advokathjálp.
Skotið verður upp, at játtaðar verða kr. 1.772.500,- á eykafíggjarlógini fyri 1995 til rakstrarstað 16904 / 33224.

Rakstrarstað 17015 Landsdjóralæknaembætið.
Játtanin á fíggjarløgtingslógini fyri 1995 til landsdjóralæknaembætið var kr. 2.063.000,-.
Lønarsparingin vegna verkfallið var kr. 38.000,-.
Samlaða játtanin til alndsdjóralæknaembætið í 1995 er kr. 2.025.000,-.

Rakstrarstað 17029 Djóralæknatænastan.
19. apríl 1994 varð gjørd avtala millum Føroya Landsstýri og Djóralæknatænastuna í sambandi við, at Djóraløknatænastan varð umskipað frá at vera almenn, er skipanin nú privat við almennum stuðli.
Í avtaluni stndur, at Djóralæknatænastan fær fyri virki, samsýning úr landskassanum kr. 1.057.000,- árliga.
Á fíggjarlógini fyri 1995 er kr. 1.000.000,- avsettar. Sostatt vant í kr. 57.000,-.
Skotið verður upp, at játtaðar verða kr. 57.000,- á eykafíggjarlógini fyri 1995, soleiðis at smlaða játtanin í 1995 til djórlæknatænastuna verður kr. 1.057.000,-.

Rakstrarstað 17205 Almennar royndir og ráðgeving innan Landbúnaðin.
Játtanin á fíggjarløgtingslógini fyri 1995 til Rakstrarstað 17205 Almennar royndir og rágeving var kr. 2.000.000,-.
Lønarsparingin vegna verkfallið var kr. 30.000,-.
Samlaða játtanin til rakstrarstað 17205 almennar toyndir og ráðgeving í 1995 er sostatt kr. 1.970.000,-.
Rakstrarstað 17901/373305 Landsstýrinum at ráða yvir.
Í oktober 1994 varð staðfest salmonella í einum fjósi. Eftir tilmæli frá landsfjóralæknanum og húsdjóranevndini varð avgjørt, við heimild í Lóg nr. 36, frá 28. 02.1908 for Færøerne om Foranstaltninger mod Smitsomme Sygdomme hos Husdyrene, at øll neytini skuldu avlívast og fjósið sóttreinsast.
Útreiðslurnar, ið standast av hesum eru lógarfestar við heimild í omanfyristandandi lóg. Ongin peningur er avsettur á fíggjarlógini til tílík tilføk, men vanligt hevur verið at nýta § 17 landsstýrinum at táða yvir til at fíggja tílíkar útreiðslur, eitt nú riðluskriða.
Játtanin á § 7 landsstýrinum at ráða yvir á fíggjarløgtingslógini fyri 1995 var kr. 50.000,-. Nýtslan á hesi konto er higartil kr. 159.000,-. Sostatt er kontoin yvitrekt við kr. 109.000,-.
Tjá salmonellamólið ikki er endaliga avgreitt enn, er ein meting gjørd hvussu nógv hetta samlð fer at kosta.
Útreiðslan verður mett til kr. 120.000,-.
Skotið verður upp, at játtaðar verða kr. 120.000,- á eykafíggjarlógini fyri 1995 til landstýrinum at ráða yvir á landbúnaðarøkinum, soleiðis at smlaða játtanin í 1995 verður 170.000,-.

Rakstrarstað 18109 Arbeiðseftirlitið
Játtanin á fíggjarløgtingslógini fyri 1995 til arbeiðseftirlitið var kr. 2.6000.000,-.
Lønarsparingarnar vegna verkfallið vóru kr. 88.000,-.
Arbeiðseftirlitið er enn bundið av einum leigusáttmál í Saltangará uppá kr. 70.000,-, sum skotið verður upp, at játta á eykafíggjarlógini fyri 1995, soleiðis at smla játtanin til arbeiðseftirlitið í 1995 veður kr. 2.582.000,-
.

Rakstrarstað 18356 Ferðaráð Føroya.
Játtanin á fíggjarløgtingslógini fyri 1995 til Ferðaráð Føroya var kr. 7.000.000,-.
Lønarsparingarnar vegna verkfallið var kr. 31.000,-.
Samlaða játtanin til Ferðaráð Føroya í 1995 er sostatt kr. 6.969.000,-.

Rakstrarstað 18361 Menningarstovan.
Játtanin á fíggjarløgtingslógini fyri 1995 til Menningarstovuna var ka. 2.200.000,-.
Lønarsparingin vegna verkfallið var kr. 16.000,-.
Samlaða játtanin til Menningarstovuna í 1995 er sostatt kr. 2.184.000,-.

Rkastrarstað 18532 Stuðul til ídnaðarfremjandi endamál.
Játtanin á fíggjarløgtingslógini fyri 1995 til stuðul til ídnaðarfremjandi endamál var 3,0 mió. kr..
Í mai 1995 var greitt, at ruennurin so at siga var uppbráktur og mátti fáa eykajáttan, um hann skuldi verða førur fyri at virka eftir sínum endamáli. Í juni 1995 samtyktu landsstýriið go fíggjarnevndin at játt grunninum 2,5 mió. kr. eyka. Upphæddin varð tikin av teinnum 15 mió. kr., sum verða fluttar úr ábyrgdargrunninum aftur í landskassn sambært løgtingslóg nr. 109 frá 29. juni 1995 um broyting í løgtingslóg um ábyrgdargrunn.

Landsstýrið hevur á fundi 3. oktober 1995 samtykt, at játta til stuðul til ídnaðarfremjandi endamál 5 mió. kr. afturat bunurav játtanini sambært løgtinslóg nr. 109 frá 29. juni 1995 um broyting í løgtingslóg um ábyrgdargrunn. Hetta mál er lagt fyri fíggjarnevndina, men svar ikki komið enn.
Skotið verður nåå at umframt eykajáttanina, sum fingin er í árinum uppá kr. 2.500.000,- at játta kr. 5.000.000,- á eykfíggjarlógina fyri 1995 til stuðul til ídnaðarfremjandi endamál, soleiðis at samlaða játtanin í 1995 til stuðul tilídnaðarfremjandi endamál verður kr. 10.500.000,-.
Peningurin úr ábyrgdargrunninum kr. 15.000.000,- er inntøkuførdur á eykfíggjarlógini fyri 1995 á rakstrarstað 9015 Inntøkuført frá ábyrgdargrunninum.

Rakstrarstað 18601 Heilsufrøðilig starvsstova.
Játtanin á fíggjarløgtingslógini fyri 1995 var 5.300.000,-.
Sparingin vegna verkfallið var 103.000,-.
Samlaða játtanin til heilsufrøiligu starvsstovuna í 1995 er sostatt kr. 5.197.000,-.

Rakstrarstað 18857 Stuðul til nýggjar vinnur.
Lógargrundurlagið er løgtingslóg nr. 17 frá 1. februar 1995 um stuðul til nýggjar vinnu, sum broytt við L1. nr. 91 frá 13. juni 1995. Eingin játtan er á fíggjarlógini fyri 1995 til henda studning.

Higartil í 1995 eru útgoldnar kr. 844.283,- í studningi. Upperðir eru sendar landsstýrinum, sum ikki eru avgreiddar, og nýtslan pr. 29.11.1995 verður tilsamans kr. 1.022.497,-. Ikki ber til at siga hvat nýtslan verður tilsamans fyri 1995, men skotið verður upp at seta 2 mió. kr. á eykafíggjarlógina fyri 1995 til endamálið.

Rakstrarstað 18983/353983 Føroya Brsndskúll.
Á gíggjarløgtingslógini fyri 1995 vóru játtaður kr. 400.000,- til íløgur á føroya Brandskúla. Orsakað av manglandi støðutakan um møguliga útbygging av skúlanum verða kr. 200.000,- ikki brúktar. Skotið verður upp á eykafíggjarlógini fyri 1995 at játta kr. 86.000,- til rakstrarstað 114895/313829 HF-skeiðið í Klaksvík (bygg undir rakstrarstað 114895/313829 viðlíkahald annars) og kr. 114.000,- til rakstrarstað 26305/213408 Ymsar ognarútreiðslur, ið verða at nýta til ymiskt óvæntað í samband við umvælingararbeiði at ognum landsins, soleiðis at samlað játtanin til í løgur á Foroya Brandskúla verða kr. 200.000,-.

Rakstrarstað 1902 Serforsorg.
Játtanin á fíggjarløgtingslógini fyri 1995 til serforsorgina var kr. 43.500.000,-. Lønarsparingin vegna verkfallið var kr. 130.742,-.

kr. 617.000,- eru fluttar frá rakstrarstaði 19868 Føroyingar á stovni í Danmark, í sambandi við at ein persónur á stovni í Danmark flutti heim til Føroyar 1. august 1995, og økt virksemi á »Virkni«.

Umlættingarheimið »Dáin« hevur fingið eina eykajáttan uppá kr. 112.940,- í sambandi við útreiðslur til eftirlønargjøld til tveir pedagogar stavandi fráa 1988. Ein misskiljing er farin fram viðvíkjandi teirra tilknýti til »Pensionsordningen af 1976«.
Hildið varð, at teir høvdu limaskap í pensiónsgrunninum

Harafturat er ein meirnýtsla uppá kr. 600.000,- sum framkemur soleiðis:

Meinútreiðslan til persónar við serligum viðgerðartørvi innan serstovnadeildina ermett til kr. 260.000,-. Øll uppheddin, ið annars verður nýtt til serligan viðgerðartørv er flutt til Sambýlið ovan Høydalar. Øll búfólk hava serliga viðgerðartørv fyri neyðini.

Táið Almannastovan yvirtók húsini á Marknagilsvegi 51 frá Landsverkfrøðinigtinum, ver neyðugt at gera broylingar í innrettingini, og ger tey mest neyðugu viðlíkahaldsarbeiðini. Hetta kostaði tilsamans kr. 220.000,-. Leiguinntøkurnar frá búfólki hevur verið kr. 96.000,-, sostatt er ein meirútreiðsla uppá kr. 124.000,-.

Serstovnadeildin hevur jí 1995 havt heilt óvaliga nógv starvsfók, sum eru lagtfðarsjúk, eins og barnsburðarfarloyvini hava verið fleiri enn valigt. Hetta eru heilt óvaligar umstøður, hesum viðvíkjandi er meirnýtslan kr. 216.000,-.
Skotið verður upp at átta á eykafíggjarlógini fyri 1995 1,2 mió kr., soleiðis at samlaða játtanin í 1995 verður kr. 44.700.000,-.

Rakstrarstað 19056 Fólkapenslón.
Játtanin á fíggjarløgtingslógini 1995 til fólkapensión var kr. 242.450.000,-. Men roknað verður við at nýtslan í 1995 verður kr. 246.550.000, . Hetta eru lógarbundnar útreiðslur, sum eru undirmettar, og sum hava eina meirnýtslu við sær í 1995 uppá kr. 4,1 mió. kr..
Skotið verður upp at játta omanfyrinevndu kr. 4.100.000,- á eykafíggjarlógina fyri 1995, soleiðis at samlaða játtanin í 1995 til fólkapensión verður kr.246.550.000,-.

Rakstrarstað 19075 Røktarheim.
Játtanin á fíggjarløgtingslógini fyri 1995 til Røktarheim var 69.500,-. Lønarsparingin vegna verkfallið var kr. 62.331,-. Og í Sambandi við, at Sandoyar ellis- og Røktarheim ikki verður tikið í nýtslu í 1995 er minniútreiðslan 2,2 mió. kr.. Hetta verður í fyrstu syftu við merkt í sambandi við uppskotið til eykafíggjarlóg við atliti til ætlan um á hesum grundarlagi at fáa í lag fígging av restfløguni.
Minniútreiðslan í 1995 verður 2,2 mió. kr.

Rakstrarstað 19089 Vistarheim fyri pensiónistar.
Játtanin á fíggjarløgtingslógini fyri 1995 til Vistarheim fyri pensiónistar var kr. 5.700,-.
Roknað verður við at brúktar verða kr. 700.000,- minni enn játtanin í 1995 til vistarheim fyri pensionistar.

Rakstrarstað 19106 Alarmispensión.
Játtanin á fíggjarlógini fyri 1995 var kr. 115.650.000,- til avlarmispensión. Hetta er eitt lógarbundin útreiðsla, sum er undirmett. Roknað verður við, at meirútreiðslan til avlarmispensión í 1995 verður kr. 3,8 mió. kr..

Skotið verður upp at játta kr. 3.800.000,- á eykafíggjarlógini fyri 1995, soleiðis at samlaða játtanin í 1995 til avlarmispensión verður kr. 19.450.000,-.

Rakstrarstað 19227 Forskotsrindan av barnapeningi.
Játtanin á fíggjarløgtingslógini fyri 1995 til forskotsrindan av barnapeningi var kr. 2.056.000,-. Roknað verður við at minninýtslan í 1995 verður kr. 1,0 mió. kr. til forskotsrindan av barnapeningi.

Rakstrarstað 19301 Einkjupensión.
Játtanin á fíggjarløgtingslógini fyri 1995 til valiga forsorg var kr. 40.600.000,-. Roknað verður við at brúktar verða 2,5 mió. kr. minni enn játtað í 1995.

Rakstrarstað 19417 Forsorg vegna arbeiðsloysi.
Játtanin á fíggjarløgtingslógini fyri 1995 til forsorg vegna arbeiðloysi var kr. 35.000.000,-, men roknað verður við, atnýtslan til forsorg vegna arbeiðsloysi verður 16,3 mió. ja. minni enn játtanin í 1995.

Rakstrarstað 19436 Umsitan av hjálpitólum.
Játtanin á fíggjarløgtingslógini fyri 1995 til umsitan av hjálpitólum var kr. 2.000.000,-.
Lønarsparingin vegna verkfallið var kr. 32.468,-. Og í árinum eru fluttar kr. 80.000,- til umsitan av hjálpi

tólum frá rakstrarstað 11359 Almannastovan.
Skotið verður upp at játta kr. 48.000,- á cykafíggjarlógina fyri 1995, soleiðis, at samlaðu útreiðslurnar til umsitan av hjálpitólum í 1995 verða kr. 2.048.000,-.

Rakstrarstað 19557 Barnaforsorg.
Barnafortsorgarlógin áleggur hvorjari kommunu at niðutseta eina barnavernd, sum hevur til uppgávu at útinna almenna barnavernd. Barnaverndarnevndirnar eru sjálvstoðugar nevnndir, og hava ikki frágreiðingarskyldu mótvegis Almannastovuni undatikið ásetingar sambært §§ 29, 33, 34, og 36 í barnaforsorgarlógini, og § 8 í kunngerð um gjaldsreglur fyri dagstovnar og dagrokt (fríplass av serligu sostalum og pedagogiskum orsøkum).

Øll tiltøk, uttan flytan á heiminum sambært §§ 24 og 25, verða veitt við heimild eftir § 22 í barnaforsorgarlógini. Sambært § 22, stk. 2-3, í Barnaforsorgarlógini tikin av somu myndugleikum, sum nevnt er í § 33, stk. 1-3 í barnaforsorgarlógini, aftaná tilmæli frá barnaverndini, t-v-s- fyri kommunur við minni enn 2.000 íbúgvum tekur bý/bygdaráðini avgerð ella eitt av bý/bygdaráðunum niðursettunevndum.

Sambært § 9, stk 4., í kunnerð nr. 6 frá 25. januar 1995 um gjaldsreglur fyri dagstovnar og dagrokt taka kommunur allar útreiðslur viðvíkjandi fríplássum og oðrum barnaverdarútreiðslu við í endurgjaldsuppgerð teirra til Almannastovuna yvir glodnar barnaverndarútreiðslur í fíggjarárinum. Uppgerðir frá kommununum eru ofta Almannastovuni so seint í hendi, at bókingar á avvarðandi fíggjarári eru endaðar, og hevur periodiseringin í landskassaroknskapinum tískil í áravís ikki verið rott.

Almannastovan vil framyvir krevja av kommununum, at ndurgjaldsuppgerð fyri farn fíggjarárið, er Almannastovuni í hendi soleiðis, at útreiðslan verður bókað á fíggjarárið, har útreiðslan er goldin. Hetta vil fyri fíggjarárið 1995 týða, at útreiðslurnar viðvíkjandi fríplássum og tilmæli frá barnaverndarnevndunum í landskassaroknskapinum í ein ávísan mun verður tvífaldað, men frá fíggjarárinum 1996 skuldu tier bókaðu útreiðslurnar í landskassaroknskapinum harafturímít verið tier veruligu útreiðslurnar í fíggjarárinum.
Hetta er ein lógarbundin útreiðsla.
Meirútreiðslan ið stendst av hesum er mett til kr. 6.300.000,- kr.

Føroya Barnaheim
Tað er bert Føroya Barnaheim, ið tekur sær av børnum, ið hava torv fyri ansing alt samdogrið. Í lotuni er pláss fyri 20 børnum á heiminum. Børn, ið nú verða innskrivað á Barnaheiminum eru verri fyri enn áður. Á barnaheiminum eru í lotuni nøkur børn, ið krevja serliga viðgerð og hjáveeru alt samdogrið.
Meirútreiðslan til barnaheimið er kr. 150.000,-.
Skotið verður upp at játta kr. 6.540.000,- (hetta svarar til samlaðu meirútreiðslunar á cykafíggjarlógini fyri 1995 soleiðis, at samlaða játtanin til barnaverndina í 1995 verður kr. 20.208.000,-.

Rakstrarstað 19607 Heimarøktin.
Játtanin í fíggjarløgtingslógini fyri 1995 til heimarøktina var kr. 60.070.000,-.
Vísandi til § 7, stk. 2, í løgtingslíg nr. 125 frá 21. mai 1993 um bútið av almannaútreiðslum v.m. skal skipanin rinda kr. 300.000,00 til hølisútreiðslur, t.v.s. útreiðslur fyri el, hita, telefon v.m., sum tað ikki er tikið hædd fyri í játtanini fyri fíggjarárið 1995.

Vísandi til semju millum Føroya Enadsstýri og Heimahjálparafelag Føroya/Føroya Arbeiðarafelag dagfest 14 september 1995 verður frá 1. september 1995 veitt endurgjald fyri nýtslu av egnum bili í tænastuørindum, uttan mun til um køyring fer fram fyri ella uttan fyri kommununa, har viðkomandi heimahjálpari býr. Útreiðslan er fyri 1995 mett til kr. 450.000,-; tó skal upphæddin takast við størsta fyrivarni, tá ið nágreiniligu roknskapartølini hesum viðvíkjandi ikki enn fyriliggja.

Tørvurin á heimhjálpum er av ymisku orsøkum stoðugt vaksandi, m.a. av tí styttu innleggingar tíðini á sjúkrahúsunum, og orskakað av frállytingini av tí yngra ættarliðinum. Talið á brúkarum er stoðugt vaksandi, og brúkarin er verri fyri enn áður, og krevur meira hjálp. Skipanin fer í 1995 at hava eina bruttomeirnýtslu uppá 1,3 mió. kr. hesum viðvíkjandi. Brúkaragjaldið verður tó 0,5 mió. kr. hægri enn mett á fíggjarætlanini. Skotið verður upp, at játta meirútreiðslunar uppá 1,5 mió. kr. á cykafíggjarlógina fyri 1995, so samlaða játtanin í 1995 verður kr. 61.570.000,-.

Rakstrarstað 19631 Dagstovnar.
Játtanin á fíggjarløgtingslógini fyri 1995 var kr. 47.000.000,-.
Lønarsparingin vegna verkfallið var kr. 563,436,-.
Roknað verður við at dagstovnarnir sum heild koma at hava eina minniútreiðslu í 1995 uppá 2,0 mió. kr.

Rakstrarstað 19659 Dagpeningaskipanin.
Játtanin á fíggjarløgtingslógini fyri 1995 var kr. 32.000.000,- til dagpeningaskipanina.
Hetta eru lógarbundnar útreiðslur, og roknað verður við eini minniútreiðslu til dagpeningaskipanina í 1995 uppá 2,1 mió. kr..

Rakstrarstað 19697 Samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima.
Játtanin á fíggjarløgtingslógini fyri 1995 var kr. 5.400.000,- til samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima.
Hetta eru lógarbundnar útreiðslur, og roknað verður við eini minniútreiðslu til samsýning fyri at ansa eldri og óhjápnum heima í 1995 uppá 1,0 mió. kr..

Rakstrarstað 19802 Løn til pedagogar undir víðari útbúgving.
Hetta er eitt rakstrarstað, sum er upprettað í fíggjarárinum.
Sambæt § 22. stk. 2. í sáttmálanum millum Føroya Landsstýri og Føroya Pedagogfelag verður miða fríði, at Almannastovan sendir 5 pedagogar árliga til víðari úbúgving á DLH ella líknandi útbúgvingarskeið, við fullari løn frá Almannastovuni, uttan aðrar treytir og eyka útreiðslur fyri pedagogin. Útreiðslan verður mett til 1. mió. kr. árliga.
Skotið verður upp atjátta kr. 125.000.- á eykafíggjarlógini fyri 1995 til endamálið.

Rakstrarstað 19868 Føroyingar á stovni í Danmark.
Í sambandi við at ein persónur á stovni í Danmark flutti heim til Føroya 1. august 1995, og økt virksemi á »Virkni« er rakstrarstaðið við kr. 617.000,-.
Roknað verður við, at samlaða minniútreiðslan í 1995 til føroyingar á stovni í Danmark verður 1,7 mió. kr.

Rakstrarstað 19892 Vanlukkutryggingarráðið
Játtanin á fíggjarløgtingslógini fyri 1995 var kr. 150.000,-.
Í kunngerð galdandi frá 1. januar 1995 er nú ásett gjald fyri viðgerð av vanlukkutryggingarmálum. Sambæt hesum verður inntøkan kr. 460.000,-, og útreiðslurnar verða kr. 700.000,-.
Tað er ein meirútreiðsla uppá kr. 90.000,-, harafrat kemur ein útreiðsla uppá kr. 167.000,-, sum átti at verið bókað á eitt annað fíggjarár frammanundan.
Skotið verður upp at seta kr. 257.000,- á eykafíggjarlógina fyri 1995, soleiðis at samlaða játtanin í 1995 til vanlukkutryggingarráðið verður kr. 397.000,-.

Rakstrarstað 19994/363971 Bústovnur Serforg.
Kr. 600.000,- verða flutt av játtanini til bústovnur serforsorg soleiðis at játtanin á hesi konto verður kr. 600.000,- í staðin fyri kr. 1.200.000,-.
Tær 600.000,- krónurnar eru við eykajáttan í árinum flutt til rakstrarstað 19994/363147 Umlattingarheim og bústovnur, Suðuroy.

Rakstrarstað 19994- 363971Bústovnur í Suðuroy.
Eykajáttan er í árinum givin til umbygging av sethúsum uppá kr. 700.00, soleiðis at samlaða játtanin til í 1995 til bústovn í Suðuroy verður kr. 1.560.000,-.
Kr. 600.000,- verður at flyta av rakstrarstað 19994/363971 Bústovnur Serforsorg.
Og kr. 160.000,- frá rakstrarstað 26305/ 213408 Ymsar ognarútreiðslur.

Rakstrarstað 22206 Rentuútreiðslur.
Á fíggjarløgting fyri 1995 vóru rentuútreiðslurnar mettartil kr. 472.000.000,-, kurstap kr. 10.000.000,- og rentur av bundnari uppsparing kr. 2.000.000,-, tilsamans kr. 484.000.000. . Nýggjastu metingarnar hjá Landsbankanum eru, at rentuútreiðslurnar (heruppí rentur av bundnari uppsparing) verða kr. 39.052.000,- minni ella kr. 434.948.000,- og kurstap kr. 17.028.000,- meira ella kr. 434.984.000,- og kurstap kr. 17.028.000,- meira ella kr. 27.028.000,-.

Rentur og kurstap verða sostatt tilsamans kr. 461.976.000,- í 1995, tað er kr. 22.024.000,- minni enn rokitað var við.

Rakstrarstað 26305/213408 Ymsar ognarútreiðslur.
Játtanin á fíggjarlógini fyri 1995 var kr. 850.000,-.
Í árinum eru nakrar flytingar farnar fram:

- 160.000,- kr.	+ 160.000,- kr.	Búsrovnur í Suðuroy
+ 114.000,- kr.	- 114.000,- kr.	Brandskúlin.
- 207.000,- kr.	+ 207.000,- kr.	Hagstovan
+ 50.000,- kr.	- 50.000,- kr.	Skráseting á ognum landsins

Samlaða játtanin til ymsar ognir í 1995 verður sostatt kr. 647.000,-.

Rakstrarstað 126302 Skráseting av landsins ognum.
Játtani á fíggjarlógini fyri 1995 til skáseting av landsins ognum var kr. 150.000,-. Men øll játtanin verður ikki brúkt. Tí verður skotið upp, sum nevnt omanfyri, at flyta kr. 50.000,- til ymsar ognarútreiðslur.

Jóannes Eidesgaard, Landsstýrismaður, Kári Petersen.

1. viðgerð 12. december 1996. Málið verð beint í fíggjarnevndina, sum 18. december legði fram søljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 8. desember 1995 og eftir 1. viðgerð tann 12. desember 1995 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og vísir á, at sambært stýriskipanarlógini skal uppskot um eykafíggjarlóg leggjast fram áðrenn 1. desember og vera endaliga samtykt áðrenn 31. desember. Nevndin átalar, at stýriskipanarlógin ikki er hildin tá landsstýrið ikki hevur lagt málið fram fyrr enn 8. desember.

Landsstýrið sigur í viðmerkingunum, at størstu broytingarnar eru í landsskattinum og meirivirðisgjaldinum, ið geva munandi meirinntøkur. Fíggjarnevndin vísir á, at størsta broyting í prosentum er bagri inntøka av skrásetingargjaldi á motorakførum. Hækkingin er 27 mió. kr. Landsstýrið hevði mett hesa inntøku á fíggjarlógini fyri 1995 til 10 mió. kr. Á eykafíggjarlógini 1995 er inntøkan sett til 37 mió. kr. Økti bilinnflutningurin hevur eisini hækkað meirvirðisgjaldið munandi.

Meirútreiðslurnar á eykafíggjarlógini 1995 útyvir játtan eru tilsamans umleið 87 mió. kr, meðan minni nýtsla í mun til fíggjarlógina 1995 er umleið 77 mió. kr.

Undir 1. viðgerð varð spurningurin reistur, um Strandferðslan hevði heimild at hava kassakreditt. Í hesum sambandi verður víst á løgtingslóg nr. 103 frá 17. december 1991 um lán til Strandfaraskip Landsins, har strandferðsluni verður heimilað at lána upp til 10 mió. kr. til fígging av rakstrinum. Upplýst er fyri nevndini at strandferðslan ger minst møguligt brúk av hesi heimild, tí rentan er so høg.

Løgtingið hevur fingið nýggja elektroniska atkvøðuskipan og er eykajattan kr. 500.000 fingin til endamálið. Nú arbeiði er liðugt er kostnaðurin av skipanini kr. 560.000. Á eykafíggjarlógini eru settur kr. 338.000, ið bert er ein partur av kostnaðinum. Neyðugt er at broyta játtanina til kr. 560.000. Í heyst kom hol á heitvans-

tangan í løgtinginum og var neyðugt at skifta hann út skiftur við ein hitavekslara. Arbeiðið kostaði kr. 9.925. ið eykajattan er fingin til. Mælt verður tí til at hækka eykajáttanina til rakstrarstað 10106 Løgtingsbygningur til kr. 570.000.

Rakstrarstað 10158 Løgtingsskrivstovan hevur fingið eina eykajáttan uppá kr. 40.000 til løn til løgfroðiligan fulltrúa. Henda eykajáttan er ikki við á eykafíggjarlógini og verður hetta rakstrarstaðið at hækka við kr. 40.000.

Viðvíkjandi rakstrarstað 11706 Hagstovan hevur landsstýrið gjørt vart við at upphæddin á eykajáttanini fyri 1995 ikki skal vera 113.000 kr, sum stendur í eykafíggjarlógini, men kr. 94.000.

Viðvíkjandi rakstrarstað 11898 Matrikulstovan er meirnýtslan mett til kr. 1.100.000. Fíggjarnevndin átalar, at ikki er søkt um eykajáttan í árinum.

Viðvíkjandi rakstrarstað 12007 Sjúkrakassar verður sagt í viðmerkingunum, at landsstýrið hevur, við loyvi frá fíggjarnevndini, avgjørt at hækka C-limagjaldið í sjúkrakassanum úr 48 kr. til 600 kr. frá 1. januar 1993. Av tí at hetta ikki er lýst sum kunngerð, hava sjúkrakassarnir ikki havt heimild at innkrevja tað hækkaða gjaldið. Fíggjarnevndin átalar, at kunngerð um broyting á upphæddini á C-limagjaldinum er lýst tvey ár ovseint av umsitingarligari líkasælu.

Viðvíkjandi rakstrarstað 12109 Landssjúkrahúsið verður sagt, at starvfólkini hava umleið 2 mió. kr. til góðar í uppspardum tímum og vilja tey flestu hava peningin tilgóðar fyri seinni at kunna avspáka. Ætlanin var at søkja fíggjarnevndina um eykajáttan til Landssjúkrahúsið í 1996 til endamálið. Fíggjarnevndin mælir til at upphæddin veður tikin av eykafíggjarlógini 1995 og flutt til fíggjarlógina fyri 1996, tí rættast er at játtanin verður sett á fíggjarlógina tað árið peningurin skal nýtast.

Viðvíkjandi rakstrarstað 12907/303344 Hvíldarheimið Naina verður sagt í viðmerkingunum, at landsstýrið í 1994 varð varugt við, at hvíldarheimið "Naina" hevur í fleiri fingið ov nógvan pening útgoldnan. Sambært løgtingslóg nr. 18. frá 9. apríl 1964 kann raksturin av hvíldarheiminum í prinsippinum ikki geva avlop. Hvíldarheimið hevði nýtt ein part av innistandindi peninginum til umbygging. Landsstýrið hevur ikki formliga góðkent umbyggingina, men varð kunnað um hana so við og við í sambandi við uppskot til fíggjarætlanir, tó uttan at nakað tá varð gjørt við málið. Fíggjarnevndin átalar, at hesi viðurskifti ikki eru fingin í rættalag.

Rakstrarstað 14307 Tekniski skúli í Klaksvík. Landsstýrið hevur boðað frá, at lønarsparingin í samband við verkfallið í vár kr. 70.000 ikki er komin við á eykafíggjarlógini og skal játtanin til rakstrarstaðið broytast samsvarandi hesum.

Viðvíkjandi rakstrastað 18532 Stuðul til ídnaðarfremjandi endamál sigur landsstýrið í viðmerkingunum, at landsstýrið á fundi 3. oktober 1995 hevur samtykt at játta stuðul til ídnaðarfremjandi endamál 5 mió. kr. aftur at burturav játtanini sambært løgtingslóg nr. 109 frá 29. juni 1995 um broyting í løgtingslóg um áhyrgdargrunn. Landsstýrið sigur, at hetta mál er lagt fyri fíggjarnevndina, men svar ikki er komið enn. Hetta er ikki rætt. Málið er skrásett í fíggjarnevndi tann 19. oktober 1995 og viðgjørt á fundi í fíggjarnevndini tann 23. oktober 1995 og samtykti nevndin: "Fíggjarnevndin er samd um, at tá kr. 15 mió. vórðu fluttar úr áhyrgdargrunninum aftur í landskassan við løgtingslóg, fer nevndin at heita á landsstýrið at fylgja somu mannagongd sum áður, nevniliga at leggja umrødda mál fyri tingið at taka støðu til. Tí præsedens er longu skapt í hesum máli við løgtingslóg nr. 109 frá 29. juni 1995." Tann 25. oktober 1995 sendi Løgtingsskrivstovan Landsstýrinum skriv um samtykt fíggjarnevndarinnar. Fíggjarnevndin átalar at slíkir skeivir upplýsingar koma í viðmerkingarnar.

Viðvíkjandi rakstrarstað 19075 Røktarheim verður sagt, at í samband við, at Sandoyar ellis- og røktarheim ikki verður tikið í nýtslu í 1995 er minniútreiðslan 2,2 mió. kr. Hetta verður í fyrstu syftu viðmerkt í samband við uppskotið til eykafíggjarlóg við atliti til ætlan um á hesum grundarlag at fáa í lag fígging av restfløgini. Um hetta merkir, at restfløgan skal gerast, so má hon fíggjast á vanligan hátt eftir galdandi reglum.

Viðvíkjandi rakstratstað 19697 Samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpinum heima, mælir fíggjarnevndin til, at lógin verður endurskoðað.

Samsvarandi framfyri standandi setir fíggjarnevndin soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

Grein 10 Løgtingið

Rakstrarstað 10106 Løgtingsbygningur verður hækkað við kr. 232.000 og sett til	kr. 1.344.000
Rakstrarstað 10158 Løgtingsskrivstovan verður hækkað við kr. 40.000 og sett til	kr. 2.569.000
Greinin verður sett til	kr. 17.523.000

Grein 11 Landsfyrisiting

Rakstrarstað 11706 Hagstovan verður lækkað við kr. 19.000 og sett til	kr. 3.643.000
Greinin verður sett til	kr. 152.589.000

Grein 12 Heilsumál

Rakstrarstað 12109 Landssjúkrahúsið verður lækkað við kr. 2.000.000 og sett til	kr. 205.609.000
Greinin verður sett til	kr. 344.310.000

Grein 14 Útbúgving og grunsking

Rakstrarstað 14307 Tekniski skúli í Klaksvík verður lækkað við kr. 70.000 og sett til	kr. 9.785.000
Greinin verður sett til	kr. 376.790.000

2. viðgerð 21. december. Broytingaruppskot nevndarinnar samtykt við 32-0-0 atkvoðum. Uppskot landsstýrisins soleiðis broytt samtykt við 32-0-0 atkvoðum. Samtykt við 32-0-0 atkvoðum at heina málið til 3. viðgerð.

Fíggjarnevndin legði fram til 3. viðgerð soljóðandi

Broytingaruppskot

Grein 12 Heilsumál

Rakstrarstað 12109 Landssjúkrahúsið
verður hækkað við kr. 2.000.000 og sett til kr. 207.607.000

Viðmerking

Landsstýrið hevur upplýst, at tær kr. 2 mió. til Landssjúkrahúsið, sum fíggjarnevndin mælti til at taka av eykafíggjarløgtingslógini eru brúktar og mugu tí setast á aftur.

Grein 15 Mentan

Rakstrarstað 15931 Studningur til kirkjugrunn
verður hækkað við kr. 478.000 og sett til kr. 3.478.000

Rakstrarstað 15997/323514 Íløgustuðul til kirkjur og
mentanarbygningar verður lækkað við kr. 478.000 og sett til kr. 1.522.000

Viðmerking:

Landsstýrið hevur í árinum saman við fíggjarnevndini játtað rakstrarstað 15931 Kirkjugrunninum kr. 478.000, samstundis sum játtanin til rakstrarstað 15997/323514 Íløgustuðul til kirkjur og mentannarbygningar varð minkað við kr. 478.000.

Anfinn Kallsberg tekur ikki undir við broytinginti í grein 12.

3. viðgerð 22. december 1995. Broytingaruppskot meirilutans í fíggjarnevndini til § 12 samtykt við 25-2-4 atkvøðum, § 12 soleiðis broytt samtykt við 26-5-0 atkvøðum. Broytingaruppskot fíggjarnevndarinnar til § 15 samtykt við 31-0-0 atkvøðum, § 15 soleiðis broytt samtykt við 31-0-0. Eykafíggjarløgtingslógin soleiðis broytt endaliga samtykt við 31-0-0 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 178, 22. december 1995.

27 Føroyar eitt valdømi

Ár 1995, mánadagin 11. desember legði Bjarni Djurholm, løgtingsmaður fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um val til Føroya løgting.

§ 1

Í løgtingslóg nr. 49 frá 20. juli 1978, sum broytt við løgtingslóg nr. 42 frá 5. mai 1987 verða gjordar hesar broytingar:
1) Sum nýggj § 1 verður sett:
"Løgtingið hevur 21 limir. Føroyar eru eitt valdømi"
2) Í § 12, 1. punktum verður sett ístaðin fyri "hvort valdømi": "hvørja sýslu".
3) Í § 17, 6. stk. ganga út orðini:
"samstundis til val í ymsum valdømum ella"
4) §§ 32 og 33 ganga út.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir kunngerð.

lagtingslov om ændring af lagtingslov om valg til Færøernes lagting.

§ 1.

I lagtingslov nr. 49 af 20. juli 1978, som ændret ved lagtingslov nr. 42 af 5. maj 1987, foretages følgende ændringer:
1) Som ny § 1 indsættes: "Lagtinget har 21 medlemmer. Færøerne er en valgkreds."
2) I § 12, 1. punktum indsættes i stedet for "opstillingskreds": "syssel".
3) I § 17, stk. 6 udgår ordene: "samtidig til valg i forskellige valgkredse eller".
4) §§ 32 og 33 udgår.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

Viðmerkingar:

Fyri trimum árum síðani varð uppskot borið á ting at broyta løgtingsvallógina soleiðis, at Føroyar gjordust eitt valdømi. Endaliga úrslitið av viðgerðini var, at uppskotið ikki vann meirluta í tinginum og fall við 13-0 atkvøðum.

Síðan hesa viðgerð eru samfelagsviðurskiftini nógv broytt og tíverri ikki til tað betra. Eisini er greiðari komið til sjóndar, hví stoðan í samfelagnum gjordist so út av lagi vánalig.
Tað er í dag breið fatan um, at politiska skipanin aldi ein hugburð, har hin einstaki politikarin, uttan mun til valdømi, gjordist bundin av lokalum áhugamálum og trýsti. Serliga gjordist hetta sjónligt seinnu helvt av áttatiárunum.
Skipanin kom serstakliga til sjóndar, tá úrslitini frá samgongusamráðingunum gjordust viðtiknar løgtingssamtyktir, har úrslitið greitt var at fáa eina politiska kabal at ganga upp heldur enn at tæna eini greiðari landsplanlegging. Samtyktir, har hesin politikkur var ursøkin til, at hugtøk sum skipapakkar, skúlapakkar, sjúkrahúspakkar, havnapakkar o.s.fr. gjordust politisk hugtøk og sum verri var, endaðu sum løgtingssamtyktir.

Negativu avleiðingarnar av hesum politikki, har javnan allar fakligar tilráðingar vórðu skúgvaðar til viks, gingu tær ikki ávísum flokkum ella tingmonnum á møti, eru, at samfelagið er vorðið kostnaðarmiklari og órationellari at reka.
Hetta økti eisini um tørv landskassans til storri inntøkur. Samfelagið endaði í eini óndari ringrás, har vaksandi peningarenslið, uttan framleiðslugrundarlag, økti kostnaðarstoðið soleiðis, at sum fráleið gjordist einki samband millum framleiðsluorkuna og so almennu og privatu nytsluna í landinum.

Vantandi sambandið millum framleiðslukostnað og virðisokingina hevði við sær alsamt vaksandi tørv á studningsupphæddum, skuldi samfelagið ikki stoðga upp.
Sostatt var vinnustruktururin óbeinleiðis stýrdur av politiska ynskinum at økja og fjølga um almennu nýtsluna. Spegilsmyndin av hesum politikki vísti seg eisini sum fráleið í vantandi efektiviteti, ov høgum íløgukostnaði, høgum skattatrýsti og harvið ov høgum kostnaðarstøði.
Henda óndu ringrás endaði sum øllum kunnugt í, at landið alt endaði sum eitt trotabúgv.

Løgtingið virkar í dag undir nýggju stýrisskipanini. Tey eru mong, ið halda, at tað var í tøkum tíma, at farið varð frá gomlu skipanini, sum var karmurin um mannagongdina, har politiskar neyðsemjur mangan komu ístaðin fyri sakliga og rætta viðgerð.
Eisini varð politiska ábyrgdin forfjónað.
Tí var rætt atborið, tá eitt samt Løgting avgreiddi lógaruppskotið til nýggja stýrisskipanarlóg, sum greitt ger skilnað millum tað lóggevandi og umsitingarliga valdið í Føroyum.
Verður vallógin hinvegin óbroytt, er vandi fyri, at nýggju stýrisskipanini fer at vanta ta skorðuna, sum verður avgerandi fyri, at lógin í verki kann virka til fulnar.
So hvørt sum tíðirnar fara at batna, er væntandi, at lokalpolitiska elementið fer at stinga seg fram aftur, og so kann søgan endurtaka seg, hóast løgtingið virkar eftir eftir nýggju stýrisskipanarlógini.
Eingin lóg er sum kunnugt betur enn tann meirlutin, sum umsitur hana, og meirlutin hevur avgerðarrættin.

Vingluta støðan hjá samgongumeirlutanum í spurninginum um nevndarvalini í summar, har gingið móti andanum í nýggju stýrisskipanini um greiðan skilnað millum løgting og landsstýri, er besta dømið um, at hóast viljin tykist góður, so er politiska holdið veikt í verki, hóvar veruleikin ikki meirlutanum.

Tá saman um kom, var tað samgonguni meiri neyðugt at fáa eina samgongukabal at ganga upp heldur enn at fylgja ætlanini við nýggju stýrisskipanini, nevniliga at gera greiðan skilnað millum lóggevandi og umsitingarliga valdið.

Tað verður javnan hildið uppá, at verða Føroyar eitt valdømi, so verður umboðanin hjá útjaðaraøkjunum við sviðusoð samanborin við miðøkið.
Hesin vansin er sjálvsagt til staðar, men við landinum skipað sum eitt valdømi, verður neyðugt við nógv dyggari skipuðum politiskum arbeiði í flokkunum. At flokkarnir allir tola eina slíka endurskoðan, er so sjálvsagt.

Higartil hava flokkarnir undan hvørjum vali hvør í sínum lagi mangan ligið í sjálvdrátti í einstøku valdømunum. Gjarað er út, uttan at flokkarnir innanhýsis altíð frammanundan hava verið samdir um ymisku rakstrarkostnaðirnar og íløgurnar.

Verða Føroyar harafturímóti eitt valdømi verður nógv størri ábyrgd løgd á arbeiðið í flokkunum, og fer politiski boðskapurin tí neyðturvuliga at laga seg til veruligu fíggjarligu møguleikarnar. Tá flokkarnir harumframt allir ynskja breiða undirtøku, fer uppstillingin sjálvsagt at verða gjørd við atliti til alt landið, eisini tey smærru økini.

Tað er undir verandi valskipan, at landið er farið av knóranum og lokaløkini nógvastaðni eru øskukøld. Tað er eisini staðfest, at skipanin ikki hevur megnað at byrgt fyri køvandi monopoliseringini og enn minni verið før fyri at liða sundur aftur flakamonopolið, sum mong meta hevur tikið breyðið frá fólki í útjaðaraøkjunum.

Umframt at broyta vallógina, eigur spurningurin um í hvønn mun tingmenn kunnu røkja annað starv, meðan teir hava sæti á tingi, eisini at verða viðgjørdur. Bæði sum framhald av nýggju stýris- og tingskipanini og eisini í ljósinum av munadyggari lóggávuarbeiði, er tað helst rætt, at løgtingsmenn burturav kunnu røkja hesa álvarsuppgávu, sum veljararnir hava sett teir til.

Í lógartekstinum verður skotið upp, at tingmannatalið verður sett til 21. Tað er ein royndur lutur, at verandi tingmannatal ikki royndist sum forðan fyri, at landið fór av knóranum og heldur ikki hevur megnað at fáa tað á rættkjøl aftur.

Verður hinvegin víst serligt atlit til geografiska býtissjónarmiðið, so gevur størri tingmannatal sjálvsagt breiðari umboðan runt landið. Varð talið ásett við støði í ynski um at tryggja hesa umboðan, so kundi tað verið sett til 27.

Hvør flokkur skal í mesta lagi stilla so nógv valevni upp svarandi til mesta talið av tingmannum.

Áðrenn verandi vallóg varð samtykt, vóru nakrar broytingar gjørdar í upprunauppskotinum í býtinum millum umdømis- og eykavaldar tinglimir. Henda broyting hevði við sær, at talið av eykavaldum tinglimum varð skorið niður, samstundis sum talið av umdømisvaldum varð hækkað samsvarandi.

Broytingin, sum var eitt politiskt ynski, og tí ikki bygdi á haldgott støddfroðiligt grundarlag, hevur verið óheppin orsakað av, at tað ferð eftir ferð hevur víst seg, at eykavaldir tinglimir resta í, tá tingmannabýtið skal gerast upp aftan á løgtingsval.

Dømi er um, at størsti flokkur, við nærum 1000 fleiri atkvøðum meira enn næststørsti flokkur, ikki fekk ágóða av sínum atkvøðutali, men fekk tillutað sama tingmanatal, sum næststørsti flokkur.

Eisini er dømi um flokk, sum fekk 10 tinglimir valdar og var bert fáar atkvøður frá ellivta manninum, hóast hann lutfalsliga átti færri enn 10. Annar flokkur fekk sama val bert fýra tinglimir, og kundi í ringasta føri lingið tríggjar, hóast hann í atkvøðum hevði meira enn helvtina av atkvøðunum hjá fyrrnevnda flokki.
Verandi valskipan við nøkrum sera smáum valdømum við lutfalsligari yvirumboðan ger harumframt, at skeiva lutfallið millum eykavaldar tinglimir kann í serligum valúrsliti gera, at flokkur, sum t.d. er næststørstur í atkvøðutali, men við breiðari umboðan um landið, kann fáa fleiri tinglimir tillutaðar enn størsti flokkur, er hesin ikki so breitt umboðaður. Býtið av eykavaldum skuldi tryggjað móti hesum vanbýti, men áðurnevnda skeiva lutfall ger, at størsti flokkur verður ov stuttur, tá eykavaldir tinglimir verða tillutaðir.

Er tað ikki meirluti fyri at broyta Føroyar til eitt valdømi, eigur verandi vallóg tí undir ollum umstøðum at verða broytt.

At neyðugt er at endurskoðað lógina, eru flestu valini síðani lógin varð viðtikin prógv um. Serstakliga eigur ein broyting at tryggja, at betur samsvar verður í býtinum millum mudømis- og eykavaldar tinglimir.

Aðrar broytingar eiga eisini at verða gjørdar, eitt nú viðvíkjandi talinum av valevnum.

Á teimum næstu síðunum er yvirlit yvir løgtingsvalini í 1990 og 1994. Við hesum tolum sum støði, eru dømi sett upp, sum vísa, hvussu úrslitið hevði verið, vóru Føroyar eitt valdømi við ávikavist 21, 27 og 32 tingmonnum.

Sjálvsagt eru hesi dømi ikki heilt eftirfarandi, tá uppstillingin til nevndu val byggja á verandi valskipan. M.a. fær okkurt valdømi einki umboð á ting, meðan onnur verða ríkiliga umboðað. Hetta hevði verið øðrvísi, var støðið undir uppstilling og vali, at Føroyar vóru eitt valdømi. Harumframt hevði eitt val, har uppstillingin bygdi á eitt valdømi, møguliga eisini ávirka støddina á flokkunum sínámillum.

Hóast hesi lýti, sýnir uppsetingin hvussu skipanin virkar, vóru Føroyar eitt valdømi.

Nú tað rekur so hart á samfelagið, er politiski spurningurin ikki, hvat vit hava hug til ella vilja, men hvat vit líggjarliga yvirhøvur kunnu loyva okkum, tí bara at reka tað, sum tað almenna ábyrgdast fyri, er ein ovurstór avbjóðing til allar politikkarar.
Verður rætt fyriskipað við møguligari lógarbroyting, fer alt samfelagið Føroyar sum frálíður at fáa gagn av eini broyttari valskipan.

Valúrslitið 1990
Atkvøðuhýtið

	A	B	C	D	E	F	G	Ialt
Norðoyggjar	1137	373	836	570	611	351	-	3878
Eysturoy	1115	1678	1124	705	966	463	70	6121
N. Streymoy	419	466	651	81	440	72	44	2143
Vágar	476	468	515	109	103	96	32	1799
S. Streymoy	2432	1753	2597	921	1294	327	460	9784
Sandoy	316	76	396	39	212	21	-	1060
Suðuroy	339	553	1686	64	582	351	60	3635
Ialt	6234	5367	7805	2489	4178	1681	666	28420
% - býtið	21,93	18,88	27,47	8,76	14,70	5,92	2,34	100,00

Valúrslitið 1990
Tingmannatalið og býtið
(verandi skipan)

	A	B	C	D	E	F	G	Ialt
Norðoyggjar	1		1	1	1	(1)		5
Eysturoy	1	2	1	(1)	1	(1)		7
N. Streymoy		1	1					2
Vágar	1		1					2
S. Streymoy	(1)2	2	2	1	1			9
Sandoy	1		1					2
Suðuroy		(1)	3		1			5
Ialt	7	6	10	3	4	2	0	32

Tølini í parantes, eru eykavaldu tinglimirnir.

Vóru Føroyar eitt valdømi:

Atkvøðuhýtið 1990 delt við tølunum 1 - 10

	/1	/2	/3	/4	/5	/6	/7	/8	/9	/10
A	6234	3117	2078	1559	1247	1039	891	779		
B	5367	2684	1789	1342	1073	895				
C	7805	3903	2602	1951	1561	1301	1115	976	867	781
D	2489	1245	830							
E	4178	2089	1393	1045	836					
F	1681	841	560							
G	666	333								

Tingmannabýti:

21 tinglimir

A	5
B	4
C	6
D	2
E	3
F	1
G	0
Tilsaman	21

27 tinglimir

A	6
B	6
C	8
D	2
E	4
F	1
G	0
Tilsaman	27

32 tinglimir

A	7
B	6
C	9
D	3
E	5
F	2
G	0
Tilsaman	32

Persónliga atkvæðubýtið 1990

A	atkv.	nr.	B	atkv.	nr.	C	atkv.	nr.
J.Sundstein	850	(1)	Lisb.Petersen	539	(1)	Atli Dam	1356	(1)
A.Kallsberg	549	(2)	Ed.Joensen	501	(2)	M.Petersen	524	(2)
Ó.Breckmann	461	(3)	J.I.Olsen	399	(3)	H.Olsen	432	(3)
J.v.Keldu	354	(4)	J.M.Olsen	264	(4)	Sv.Midjord	426	(4)
B.Danielsen	279	(5)	Finnb.Arge	254	(5)	T.Arabo	347	(5)
S.Å.Ellefsen	263	(6)	I.Johannesen	220	(6)	V.Johannesen	336	(6)
O.Olsen	253	(7)	Fl.Mikkelsen	210	(7)	E.Davidsen	292	(7)
Já Lakjuni	237	(8)	Eyð.Hansen	172	(8)	J.Thomsen	272	(8)
J.Petersen	171	(9)	Hø.Mortensen	172	(9)	J.Eidesgaard	264	(9)
Ø.D.Jacobsen	149	(10)	T.Davidsen	166	(10)	M.D.Sørensen	206	(10)
						Mi.Sørensen	199	(11)
						J.A.Johannesen	192	(12)
						D.R.Petersen	162	(13)

D	atkv.	nr.	E	atkv.	nr.	F	atkv.	nr.
Lasse Klein	364	(1)	Fi.Isaksen	408	(1)	T.Niclasen	282	(1)
H.D.Neystabø	364	(1)	Sl.Hansen	322	(2)	N.P.Danielsen	175	(2)
Asb.Joensen	293	(3)	H.Nielsen	235	(3)	Ja.Olsen	161	(3)
Ro.Poulsen	104	(4)	H.O.Heinesen	230	(4)	B.Justinussen	112	(4)
Torb.Poulsen	100	(5)	D.Nielsen	219	(5)	Jav.Rana	97	(5)
K.P.Højgaard	84	(6)	J.Durhuus	206	(6)			
			P.Reinert	196	(7)			
			H.Paturssøn	165	(8)			

Tingmannabýtið millum flokkarnar vóru Føroyar eitt valdømi – **1990/21 tinglimir**

A: 5 limir Suðurstr. 3 Norðoyar 2	B: 4 limir Suðurstr. 1 Eysturoy 3	C: 6 limir Suðuroy 2 Suðurstr. 2 Norðoyar 1 Norðstr. 1	D: 2 limir Eysturoy 1 Suðurstr. 1
E: 3 limir Suðurstr. 1 Eysturoy 1 Suðuroy 1	F: 1 lim Eysturoy 1		

1990/27 tinglimir

A: 6 limir Suðurstr. 3 Norðoyar 2 Vágar 1	B: 6 limir Eysturoy 3 Suðurstr. 2 Vágar 1	C: 8 limir Suðuroy 2 Suðurstr. 2 Norðoyar 1 Eysturoy 1 Norðstr. 1 Vágar 1	D: 2 limir Eysturoy 1 Suðurstr. 1
E: 4 limir Suðurstr. 1 Eysturoy 1 Suðuroy 1 Norðoyar 1	F: 1 lim Eysturoy 1		

1990/32 tinglimir

A: 7 limir Suðurstr. 3 Norðoyar 2 Eysturoy 1 Vágar 1	B: 6 limir Eysturoy 3 Suðurstr. 2 Vágar 1	C: 9 limir Suðuroy 3 Suðurstr. 2 Norðoyar 1 Eysturoy 1 Norðstr. 1 Vágar 1	D: 3 limir Eysturoy 1 Suðurstr. 1 Norðoyar 1
E: 5 limir Suðuroy 2 Suðurstr. 1 Eysturoy 1 Norðoyar 1	F: 2 limir Eysturoy 1 Norðoyar 1		

Tingmannabýtið millum verandi valdømi vóru Føroyar eitt valdømi

1990, 21 tinglimir - valdømi	Tinglimir
Norðoyggjar	3
Eysturoy	6
Norðstreymoy	1
Vágar	0
Suðurstreymoy	8
Sandoy	0
Suðuroy	3
Tilsaman	21

1990, 27 tinglimir – valdømi	Tinglimir
Norðoyggjar	4
Eysturoy	7
Norðstreymoy	1
Vágar	3
Suðurstreymoy	9
Sandoy	0
Suðuroy	3
Tilsaman	27

1990, 32 tinglimir - valdømi	Tinglimir
Norðoyggjar	6
Eysturoy	8
Norðstreymoy	1
Vágar	3
Suðurstreymoy	9
Sandoy	0
Suðuroy	5
Tilsaman	32

Valúrslitið 1994
Atkvøðubýtið

	A	B	C	D	E	F	G	H	I	J	Ialt
Norðoyggjar	766	426	434	460	702	403	56	83	94	59	3483
Eysturoy	814	1543	509	319	624	444	110	475	611	75	5524
Norðstreymoy	248	564	295	83	323	60	57	89	165	40	1924
Vágar	384	539	219	25	144	64	28	146	95	-	1644
Suðurstreymoy	1384	2177	1168	488	1131	167	320	520	1120	315	8790
Sandoy	300	113	230	10	200	18	4	56	-	-	931
Suðuroy	196	624	1063	39	383	450	33	122	336	-	3246
Tilsaman	4092	5986	3918	1424	3507	1606	608	1491	2421	489	25542
% - býtið	16,02	23,44	15,40	5,58	13,73	6,29	2,40	5,80	9,50	1,90	100,06

Tingmannatalið og býtið
(verandi skipan)

	A	B	C	D	E	F	G	H	I	J	Ialt
Norðoyggjar	1		1	1	1						4
Eysturoy	1	2			1	(1)		(1)	1		7
Norðstreymoy		1			1						2
Vágar	1	1									2
Suðurstreymoy	2	3	1	(1)	1			(1)	1		10
Sandoy	1		1								2
Suðuroy		1	2			1			(1)		5
Tilsaman	6	8	5	2	4	2		2	3		32

Tølini í parantes, eru eykavaldir tinglimir.

Vóru Føroyar eitt valdømi:

Atkvøðubýtið 1994 deilt við tølunum 1-10

	/1	/2	/3	/4	/5	/6	/7	/8	/9	/10	Ialt
A	4092	2046	1364	1023	818	682	585	512			
B	5986	2993	1995	1497	1197	998	855	748	665	599	
C	3918	1959	1306	980	784	653	560	490			
D	1424	712	475								
E	3507	1754	1169	877	701	585	501				
F	1606	803	535	402							
G	608	304									
H	1491	746	497								
I	2421	1211	807	605	484						
J	489	245									

Tingmannabýtið

21 tinglimir:

A	4
B	6
C	3
D	1
E	3
F	1
G	0
H	1
I	2
J	0
Ialt	21

27 tinglimir:

A	5
B	7
C	4
D	1
E	4
F	2
G	0
H	1
I	3
J	0
Ialt	27

32 tinglimir:

A	5
B	8
C	5
D	2
E	5
F	2
G	0
H	2
I	3
J	0
Ialt	32

Persóntiga atkvøðubýtið 1994

A	atkv.	nr.	B	atkv.	nr.	C	atkv.	nr.
Ó.Breckmann	509	(1)	B.á Heygum	648	(1)	M.Petersen	595	(1)
A.Kalsberg	392	(2)	L.Petersen	370	(2)	J.Eldesgaard	356	(2)
Kj.Joensen	263	(3)	E.Joensen	327	(3)	H.Old	224	(3)
J.Petersen	192	(4)	J.I.Olsen	267	(4)	S.Midjord	200	(4)
B.Djurholm	166	(5)	J.Johannesen	217	(5)	T.Arabo	175	(5)
J.á Lakjuni	156	(6)	E.Arge	210	(6)	M.Sørensen	154	(6)
O.Olsen	153	(7)	J.A.Hansen	198	(7)	V.Johannesen	141	(7)
B.Danielsen	137	(8)	M.Hansen	192	(8)	A.Dam	135	(8)
J.Nielsen	116	(9)	J.Lamhauge	169	(9/10)	D.Petersen	131	(9)
			J.M.Olsen	169	(9/10)			
			P.Ellefsen	164	(11)			

D	atkv.	nr.	E	atkv.	nr.	F	atkv.	nr.
H.D.Neystabø	207	(1)	H.O.Heinesen	462	(1)	L.Klein	310	(1)
Á.Zachariasen	125	(2)	E.Isakson	221	(2)	J.Olsen	278	(2)
S.Pf Grund	112	(3)	S.á Brúnni	184	(3)	N.P.Danielsen	179	(3)
K.H.Joensen	91	(4)	J.Durhuus	161	(4)	L.í Bøl	70	(4)
R.Poulsen	68	(5)	H.T.Olsen	143	(5)	R.Nielsen	61	(5)
			H.Nielsen	142	(6)			
			H.Paturssøn	136	(7)			

H	atkv.	nr.	I	atkv.	nr.
T.Niclasen	313	(1)	K.Magnussen	565	(1)
J.av Rana	237	(2)	Ó.Jacobsen	447	(2)
P.K.av Rana	62	(3)	I.Winther	237	(3)
H.Lützen	53	(4)	E.Hansen	133	(4)
			L.Apol	126	(5)
			Á.Tausen	51	(6)

Tingmannabýtið millum flokkarnar
(Føroyar eitt valdømi)

1994/21 tinglimir

A: 4 limir		B: 6 limir		C: 3 limir		D: 1 lim	
Norðoyar	1	Eysturoy	2	Suðurstr.	1	Suðurstr.	1
Eysturoy	1	Suðurstr.	3	Suðuroy	2		
Suðurstr.	1	Vágar	1				
Sandoy	1						

E: 3 limir		F: 1 lim		H: 1 lim		I: 2 limir	
Norðoyar	1	Eysturoy	1	Eysturoy	1	Eysturoy	1
Eysturoy	1					Suðurstr.	1
Suðurstr.	1						

1994/27 tinglimir

A: 5 limir		B: 7 limir		C: 4 limir		D: 1 lim	
Norðoyar	1	Eysturoy	3	Suðurstr.	1	Suðurstr.	1
Eysturoy	1	Suðurstr.	3	Suðuroy	3		
Suðurstr.	2	Vágar	1				
Sandoy	1						

E: 4 limir		F: 2 limir		H: 1 lim		I: 3 limir	
Norðoyar	1	Eysturoy	1	Eysturoy	1	Eysturoy	1
Eysturoy	1	Suðuroy	1			Suðurstr.	1
Norðstr.	1					Suðuroy	1
Suðurstr.	1						

1994/32 tinglimir

A: 5 limir		B: 8 limir		C: 5 limir		D: 2 limir	
Norðoyar	1	Eysturoy	3	Norðstr.	1	Norðoyar	1
Eysturoy	1	Norðsstr.	1	Suðurstr.	1	Suðurstr.	1
Suðurstr.	2	Vágar	1	Suðuroy	3		
Sandoy	1	Suðurstr.	3				

E: 5 limir		F: 2 limir		H: 2 limir		I: 3 limir	
Norðoyar	1	Eysturoy	1	Eysturoy	1	Eysturoy	1
Eysturoy	2	Suðuroy	1	Suðurstr.	1	Suðurstr.	1
Norðstr.	1					Suðuroy	1
Suðurstr.	1						

Tinguatnahýtið millum verandi valdømi vóru Føroyar eitt valdømi

1994, 21 tinglimir – valdømi	Tinglimir
Norðoyar	2
Eysturoy	7
Norðstreymoy	0
Vágar	1
Suðurstreymoy	8
Sandoy	1
Suðuroy	2
Tilsaman	21

1994, 27 tinglimir valdømi	Tinglimir
Norðoyar	2
Eysturoy	8
Norðstreymoy	1
Vágar	1
Suðurstreymoy	9
Sandoy	1
Suðuroy	5
Tilsaman	27

1994, 32 tinglimir - valdømi	Tinglimir
Norðoyar	3
Eysturoy	9
Norðstreymoy	3
Vágar	1
Suðurstreymoy	10
Sandoy	1
Suðuroy	5
Tilsaman	32

1. viðgerð 18. december 1995. Málið verð beint í rettarnevndina, sum 9. apríl 1996 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Bjarna Djurholm, løgtingsmanni, tann 11. december 1995 og eftir 1. viðgerð 18. december 1995 beint í rettarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur eisini innkallað Petur Zachariassen, hagfræðing, til fundar í nevndini at greiða frá núverandi valskipan og møguligum broytingum, sum kunnu verða gjørdar í skipanini.

Rættarnevndin hevur býtt seg 5 minnilutar. Av tí at uppskotið er ófullfíggjað og neyðugt er við niðanfyristandandi broytingum í vallógini, um hon verður broytt soleiðis, at Føroyar gerast eitt valdømi, setir rættarnevndin av lógartekniskum ávum fram soljóðandi:

broytingaruppskot

§ 1, nr. 2 verður broytt soleiðis:
"§ 12 verður orðað soleiðis:
"Løgtingið velur fyri 4 ár eina valnevnd við 15 limum og eins nógvum tiltakslimum, harav í minsta lagi ein limur og ein tiltakslimur skulu vera úr hvørjari sýslu. Løgtingið velur eisini formannin og næstformannin. Limirnir hava skyldu at taka við starvinum uttan so, at teir eru fyltir 60 ár ella eftir løgtingsins meting hava lógligt forfall.""

Nr. 3 verður nr. 10 og sum nýtt nr. 3 verður sett:
"3) Í § 13, stk. 2, verða orðini: "tey í § 9 nevndu" strikað."

Nr. 4 gongur út og sum nýtt nr. 4 verður sett:
"4) Í § 13, 2. stk., verður "valstýrið" broytt til: "formaðurin í valnevndini"."

Sum nýtt nr. 5 verður sett:
"5) Í § 15, 2. stk., verður "valnevndunum" broytt til: "valnevndini"."

Sum nýtt nr. 6 verður sett:
"6) Í § 16, 1. stk., verða orðini "í øllum valdømunum" strikað."

Sum nýtt nr. 7 verður sett:
"7) Í § 17 verða orðini "í einum valdømi" strikað."

Sum nýtt nr. 8 verður sett:
"8) Í § 17, 2. stk., verða orðini "í valdømunum" strikað."

Sum nýtt nr. 9 verður sett:
"9) Í § 17, stk. 4., verða orðini "avvarðandi løgtingsnevnd" broytt til: "løgtingsvalnevndini"."
10) Í § 17, 6. stk. ganga út orðini: "saðnstundis til val í ymsum valdømum ella".

Sum nýtt nr. 11 verður sett:
"11) Í § 18, 1. stk., verða orðini "í sama valdømi" strikað."

Sum nýtt nr. 12 verður sett:
"12) Í § 18, 2. stk., verða orðini "viðkomandi løgtingsvalnevnd" broytt til: "løgtingsvalnevndini"."

Sum nýtt nr. 13 verður sett:
"13) Í § 29, 3. stk., verða orðini "løgtingsvalnevndini í viðkomandi valdømi" broytt til: "formanninum fyri løgtingsvalnevndini"."

Sum nýtt nr. 14 verður sett:
"14) § 30, stk. 1, verður orðað soleiðis: "Løgtingsvalnevndin kemur saman í seinasta lagi vikudagin eftir valið til endaliga uppgerð av valinum.""

Sum nýtt nr. 15 verður sett:
"15) §§ 31-50 verða §§ 32-48."

Sum nýtt nr. 16 verður sett:
"16) Í § 32, 1. punktum, verða orðini: "í sama valdømi" strikað."

Sum nýtt nr. 17 verður sett:
"17) Í § 32 verður 2. punktum strikað."

Sum nýtt nr. 18 verður sett:
"18) Í "Yvirlit yvir valstøð" verða orðini: "Valdømi" og "Norðoya", "Austuroyar", "Norðstreymoyar", "Vágar", "Suðurstreymoyar", "Sandoyar" og" Suðuroyar" strikað."

Ein minniluti (Bjørn á Heygum og Ingeborg Vinther) tekur undir við, at Føroyar verða eitt valdømi men skal hetta verða undir galdandi valskipan annars, t.v.s. við sama tingmannatali og skal býtið av atkvøðum skipast sum nú, og seta tey tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

§ 1, nr. 1 verður orðað soleiðis:
"Løgtingið hevur í minsta lagi 27 og í mesta lagi 32 limir. Føroyar eru eitt valdømi."

Ein annar minniluti (Sune Jacobsen) tekur ikki undir við uppskotinum og hevur annars hesar viðmerkingar:

Uppskotið um Føroyar sum eitt valdømi hevur tvey høvuðsendamál, nevniliga:
1) at fáa eina rettvísari valskipan.
2) at koma lokalpolitikkinum til lívs.

Ad 1: Í Føroyum eins og grannalondunum rundan um okkum hava vit eina valskipan við valdømisvaldum og eykavaldum tinglimum. Í fyrstu atløgu verður fumið fram til teir valdømisvaldu tinglimirnar, sum verða valdir við lutfalsvali í teimum 7 valdømunum. Við umdømisvaldu tinglimunum kann umboðanin verða órettvís í mun til tað atkvøðutalið, ið flokkarnir hava fingið.

Fyri at bøta um hetta, verður javnað út við eykavaldu umboðunum. Henda skipan verður av sakkonum metti at vera tann, sum gevur flokkunum eina tað mest rettvísu umboðanina á tingi samsvarandi atkvøðubýtinum, men av tí at ov fáir eykavaldir tingmenn eru at býta, kann tað sjálvsagt henda, at flokkarnir ikki fáa tað tingmannatal, teir av røttum eiga. Sum dømi kann verða nevnt, at í donsku valskipanini eru 135 umdømisvaldir tinglimir, meðan tað eru 40 eykavaldir. Høvdu vit her á landi havt sama lutfallið við 32 tinglimum, so átti talið av umdømisvaldum heldur at verið 25 og eykavalda talið 7 ella kanska heldur 8, sum stýrisskipanarlógin heimilar, og sum hevði givið ólíkatingmannatalið 33, ið hevði verið skynsamari loysn, tá tað ongantíð hevði kunnað komið fyri, at tingið var býtt í tveir líka stórar bólkar.

Í dag fer tingmannabýtið hjá okkum fram eftir sokallaðu d'Hondt-talskipanini. Aðrir máta eru, og sum dømi kann verða nevnt, at í Danmark verður brotalsmátin nýttur (1,4 - 3 - 5).

Samanumtikið kann sigast, at tað her vel til at fáa eina rettvísari valskipan, uttan at Føroyar verða gjørdar til eitt valdømi.

Ad 2: Hetta er triðja ferðin, hetta málið er lagt á tingborð síðan 1990. Tað er eingin loyna, at vanlig lugsan millum manna er, at vóru Føroyar skipaðar sum eitt valdømi, vildi hetta lutfallsliga styrkt um umboðanina í miðstaðarøkinum. Tað viðgongur uppskotsstillarin, Bjarni Djurholm, eisini. Verl er eisini at leggja sær í

geymt, at uppskotsstillararnir altíð hava umboðað Suðurstreymoyar valdømi, og eingin er so bláoygdur at halda, at hetta verður gjørt fyri at gera umboðanina í valdømunum veikari.

Í tí fyrsta uppskotinum um Føroyar sum eitt valdømi verður sagt í viðmerkingunum: "Vit fáa bygdapolitikk við verandi skipan". Í hesum sambandi verður víst á útbyggingina í landsvegakervinum, í fiskiskipallotanum, fiskivinnuni, á sjúkrabús- og skúlaøkinum. Um hetta var kongstaðkin við uppskotinum at steðga útbyggingini av útjaðaraøkinum, so kemur hetta uppskotið, lukkutíð, fleiri ár ov seint.

Um endamálið við uppskotinum er at koma lokalpolitikkinum til lívs, so ivast hagfrøðingur, um hetta hevði bjálpt. Hann sigur: "Eg er nokk so vístur í, at fólk tá høvdu valt øðrvísi, enn tey gera í dag. At lokalu áhugamálini í einstøku bygdunum júst høvdu fingið veljatan at fylkjast um eitt ávíst valevni fyri at fáa tað valt."

Minnilutin vísir á, at kreppa í samfelagnum altíð rakar útjaðaraøkini fyrst. Í so máta eru Føroyar eitt undantak, sum almennu hagtølini eisini prógva. Hetta uppskotið er eftir minnilutans samføring ein trojanskur hestur, sum í versta føri kann skunda undir at máa støðið undan tí sindrinum av almennum tænastum, ið enn eru eftir í útjaðaraøkjunum. Bygnaðurin í Fiskavirking er eitt feskt skúladømi um, at útjaðaraøkini, sum vóru framleiðsluøkir burturav, vóru við skerdan lut. Tí er eingin grund at broyta ta umboðan, sum verandi valskipan við umdømisvaldum tinglimum veitir teimum.

Hin triði minnilutin (Marita Petersen) tekur ikki undir við uppskotinum. Hon heldur tað vera neyðugt at endurskoða valskipanina, men ivast í, um hetta uppskotið er nóg mikið, av tí at hon heldur, at fleiri aðrar broytingar samstundis eiga at verða umhugsaðar, t.d. spurningurin um "sperrimarkið" og møgulig broyting í tingmannatalinum. Hon heldur tí, at tað hevði verið rattast, at settur varð ein nevnd at arbeiða við spurninginum um, hvussu her til at fáa eina betri og rettari valskipan, um tað so verður við einum ella fleiri valdømum.

Hin fjórði minnilutin (Jógvan á Lakjuni) tekur støðu í tingsalinum.

Hin fimti minnilutin (Signar á Brúnni og Lasse Klein) tekur ikki undir við uppskotinum og setir eitt uppskot fram.

2. viðgerð 24. apríl 1996. Broytingaruppskot frá samlari nevnd fekk 11-2-15 atkvøður og fall. Broytingaruppskot frá minnilutanum fekk 6-3-19 atkvøður og fall. Upprinnauppskotið fekk 4-4-20 atkvøður og fall.

28 Løgtingslóg um endurrindan til ymiskar kommunur fyri ferjulegur

Ár 1995, mánadagin 11. desember legði Jógvan á Lakjuni, løgtingsmaður fram seljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um endurrindan til ymiskar kommunur fyri ferjulegur.

§ 1. Sum endurrindan fyri ferjulegur verður í fíggjarárinum 1996, 1997 og 1998 árliga goldið úr landskassanum til

Vestmanna kommunu	kr. 879.033
Leirvíkar kommunu	kr. 1.482.033
Sjóvar kommunu	kr. 736.033
Tvøroyrar kommuna	kr. 853.066.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar:
Í áttatiárunum vórðu fleiri ferjulegar bygdar fyri at betra um samferðsluviðurskiftini. Endamálið var at gera tað lettari at ferðast hjá øllum millum partar av landinum. Summar bygdir komu sostatt at vera ferjuhavnir, uttan at bygdin ella kommunan sjálv beinleiðis hevði brúk fyri einum slíkum anleggi.

Í nokrum førum var ferjubyggingin og onnur havnabygging gjørd samstundis, meðan í summum førum ferjubyggingin mest sum varð gjørd uttan beinleiðis samanhang við havnaumstøðurnar annars.

Ymiskt var eisini, hvør ið bar kostnaðin av ferjulegunum, og hvussu býtið var millum landið og kommununar. Í summum førum rindaði landið allan ella mestsum allan kostnaðin (Oyragjógv og Skopun).

Nakrar kommunur komu beinleiðis illa fyri, av ti at tær skuldu gjalda ein lutfalsliga stóran part av útreiðslunum til ferjuhavn. Serliga kundu nevnast Leirvíkar og Vestmanna kommunur – men eisini aðrar, um ikki við so stórum upphæddum.

Kommununar, sum hugsað verður um í hesum sambandi, eru: Vestmanna kommuna, Leirvíkar kommuna, Sjóvar kommuna og Tvørovrar kommuna.

Kostnaðurin til ferjuúthyggingina í hesum 4 kommunum var tilsamans kr. 118,505 mió. kr.

Býti upp á kommunur og kommunanna part vóru upphæddirnar:

	Tilsamans	Komm.partur – 25%
Vestmanna kommuna	26,371 mió. kr.	6,59 mió. kr.
Leirvíkar kommuna	44,461 mió. kr.	11,11 mió. kr.
Sjóvar kommuna	22,081 mió. kr.	5,52 mió. kr.
Tvørovrar kommuna	25,592 mió. kr.	6,40 mió. kr.

Sum nevnt eru summar kommunur komnar heilt illa fyri orsakað av hesum stóru fløgum, og tað er rettiliga órímiligt, at tær skulu bera ein so stóran part av útreiðslunum, tá ið hugsað verður um, at ferjulegurnar eru ein partur av landsveganetinum, sum øllir Føroyingar njóta gott av.

Ein ferjulega kostar stórt sæð tað sama, hvar hon verður bygd, og tí kann tykjast órímiligt, at ein lítil bygd skal gjalda lítka stóran part av útreiðslunum sum eitt stórri pláss, har fólkagrundarlagið er nógv stórri.

Eitt annað, sum kann verða nevnt, er, at í byggitíðini líggjaðu kommununar 100%, og tí varð byggirentan sera stór – í t.d. Leirvíkar kommuna millum 7 og 8 mió. kr., og henda kostnaðin bóru kommununnar einsamallar.

Fleiri av hesum kommununum hava í dag ongan moguleika at lækka sítt skattaprosent, og tað kann vera sera óheppið fyri tær, tá ið hugsað verður um, at grannabygdarnar kanska kunnu hava eitt skattaprosent, sum liggur eini 4-5% lægri.

Tað verður tí hildið rímiligt, at nevndu kommunur fáa endurgoldið ein part av sínum útreiðslum til ferjuhavnir, og í hesum lógaruppskoti verður lagt upp til, at landsins partur verður hækkaður til 85%, soleiðis at kommunanna partur lækkar niður á 15%. Tí v.s. at kommununar fáa endurgoldið 10% av tí samlaða kostnaðinum.

Tí verður sett lógaruppskot fram um, at landskassin rindar viðkomandi kommunum hesar upphæddir:

Vestmanna kommuna	10% av 26.371 mió.	2.637.100 kr.
Leirvíkar kommuna	10% av 44.461 mió.	4.446.100 kr.
Sjóvar kommuna	10% av 22,081 mió.	2.208.100 kr.
Tvøroyrar kjommunu	10% av 25.592 mió.	2.559.200 kr.

Tann samlaði kostnaðurin fyri landskassan eftir hesum uppskoti verður kr. 11.850.500. Skotið verður upp, at endurrindanin fer fram við líka stórum árligum gjøldum í 3 ár. Útreiðslan hjá landskassanum verður sostatt kr. 3.950.166 árliga í 1996, 1997 og 1998.

Tað, at kommunurnar fáa hesar upphæddir endurgoldnar, hevur sjálvandi við sær, at búskapurin hjá teimum batnar, men hetta fær eisini óbeinleiðis positiva ávirkan á allan landsbúskapin.

1. viðgerð 13. desember 1995. Málið varð beint í mentanarnevndina, sum 14. februar 1996 legði fram soljóðandi

Átit

Málið er lagt fram av Jógvani á Lakjuni, løgtingsmanni, tann 11. december 1995 og eftir 1. viðgerð 13. december 1995 beint í mentannarnevndina.

Nevndin hevur á fleiri fundum viðgjørt málið og hevur í hesum sambandi innkallað landsstýrismannin Sámal Petur í Grund, landsverksfrøðingin Henning Jacobsen og deildarleiðaran hjá landsverksfrøðinginum Signar Heinesen til fundar í nevndini.

Harumframt hevur Leirvíkar kommuna eftir umbøn verið við á einum nevndarfundi og greitt frá sínum sjónarmiðum.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í fýra minnilutar.

Ein minniluti (Jógvan Adolf Johannessen, Sune Jacobsen og Henrik Old) tekur ikki undir við uppskotinum í verandi líki og setir einki uppskot fram.

Ein annar minniluti (Maria Hansen og Jógvan Durhuus) kann ikki taka undir við uppskotinum so, sum tað er sett fram, og hevur hesar viðmerkingar:

Lógaruppskotið gevur ikki rúmd fyri at loysa tann veruliga fíggjarliga trupulleikan, ið ávísar kommunur eru í av at fíggja ta almennu uppgávu, sum ferjulegurnar eru. Karmurin í hesum lógaruppskoti er ov trongur. Tí tilskilar minnilutin sær framvegis at virka fyri at finna møguleikar, sum veruliga muna.

Í øðrum lagi tekur minnilutin nevndarlimurin Maria Hansen undir við tí størsta minnilutanum (Jógvan Adolf Johannessen, Sune Jacobsen, Henrik Old).

Hin triði minnilutin (Bjarni Djurholm) hevur hesar viðmerkingar:

Við støðu í tí, sum komið er fram undir viðgerðini av hesum máli, verður ásannað, at tørvur er á at loysa teir trupulleikar, ið ávísar kommunur hava, og tekur minnilutin tí undir við hesum lógaruppskoti.

Undir nevndarviðgerðini er komið undan kavi, at fleiri nevndarlimir halda, at fyriliggjandi uppskot er ov lítið víttfevnandi. Fellur uppskotið, eigur landsstýrið at fara í holt við fyrireikingar til loysa á hesum máli, sum bera í sær, at lætt verður um rakstrarkostnaðin av ferjulegunum í teimum kommununum, har ferjulegurnar eru at rokna sum náttúrligur partur av landsvegakarvinum. Víst verður annars til viðmerkingarnar í løgtingsmáli nr. 28/95. Skoytt kann verða uppí, at møguliga eiga aðrar ferjulegur enn tær, ið nevndar eru, at verða tiknar við.

Hin fjórði minnilutin (Jenis av Rana) hevur hesar viðmerkingar:

Hetta mál er so umfatandi, fylgjurnar fyri kommununnar so lenjandi og loysningsmøguleikarnir so nógvir, at eitt meiri miðvist arbeiði, har tær umfataðu kommununar verða við, má setast í verk fyri at finna eina loysn, sum hvør einstøk av hesum kommununum kann góðtaka. Fyriliggjandi uppskot nøktar ikki tørv kommununna, og kann minnilutin (Jenis av Rana) tí ikki taka undir við tí.

2. viðgerð 7. mars 1996. Uppskotið fekk 6-5-14 atkvøður og fall.

29 Broyting í løgtingslóg um Landsbanka Føroya

Ár 1995, mánadagin 11. desember legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um Landsbanka Føroya.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 57 frá 2. oktober 1978 um Landsbanka Føroya, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 81 frá 13. juni 1995 verða gjørdar hesar broytingar:
1) § 4. stk. 2. litra a verður orðið soleiðis:
"5 limir valdir av Føroya Landsstýri eftir tilmæli frá Búskapurráðnum, harav minst ein skal vera búskapafrøðingur og ein skal vera løgfrøðingur. Hinir skulu umboða hvør sína vitan um samfelag og búskap."
2) § 23 verður strikað.

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er lýst. Samstundis fer allur danski teksturin úr gildi.
Stk. 2. Nýval av umsjónarráðnum eftir hesari lóg fer fram, tá ið verandi valskeið er umliðið og í seinasta lagi 1. oktober 2000.

Viðmerkingar:

Tá fleiri lógir fyri í ár vóru broyttar, orsakað av, at nýggja stýrisskipanarlógin kom í gildi, og løgtingið hereftir ikki longur kann velja nevndir, ráð o.s.fr., varð landsbankalógin eisini broytt soleiðis, at tað bleiv landsstýrið, ið valdi, í staðin fyri løgtingið, (løgtingslóg nr. 81 frá 13. juni 1995).

Vegna tað, at løgtingið undir viðgerðini ynskti eina endurskoðan av valreglunum, bleiv nýggj grein samtykt, sum tekur lógina av 1. januar 1996. Neyðugt er tí at leggja hetta lógaruppskot fyri tingið.

Umsjónarráð Landsbanka Føroya telur 11 limir, og verður hetta óbroytt eisini eftir uppskotnu lógarbroytingina.

Áðrenn lógin varð broytt, valdi løgtingið 3 limir í umsjónarráð Landsbanka Føroya og landsstýrið 2 limir, harav ein løgfrøðing og ein búskapurfrøðing, og hesir skuldu so ganga aftur í nevndini. Herumfram valdu vinnufeløgini 6 limir í umsjónarráðið.

Nevndin taldi 5 limir, 3 valdir av umsjónarráðnum, og teir tveir, sum landsstýrið valdi. Hetta verður ikki broytt við hesum broytingaruppskoti.

Aftaná lógarbroytingina (Lt. 81/1995), velur landsstýrið nú 5 limir í umsjónarráðið.

Lógarbroytingin, ið nú verður skotin upp fyri tinginum, hevur við sær, at landsstýrið velur sínar 5 limir í umsjónarráðið eftir tilmæli frá búskaparráðnum. Harav skal minst 1 vera búskaparfrøðingur og 1 løgfrøðingur, og hesir ganga aftur í nevnd landsbankans. Hinir 3 skulu umboða hvør sína vitan um samfelag og búskap. Vinnufeløgini velja sum frammanundan 6 limir í umsjónarráðið.

Lógaruppskotið hevur ikki við sær fíggjarligar avleiðingar ella broyting í starvsfólkatørvi.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar.

Ad. § 1 nr. 1. Broytingin merkir, at landsstýrið velur 5 limir í umsjónarráð Landsbanka Føroya eftir tilmæli frá Búskaparráðnum, harav 1 búskaparfrøðing og 1 løgfrøðing. Hinir skulu umboða hvør sína vitan um samfelag og búskap.

Ad. § 2, stk. 2. Tá nýggja stýrisskipanarlógin kom í gildi, skuldi umsjónarráðið veljast av nýggjum. Landsstýrið hevur valt sínar 5 limir, og vinnufeløgini eru í fer við at velja sínar limir.

Um so er, at limirnir í umsjónarráðnum skulu veljast av nýggjum, eftir at henda lóg er samtykt, so kemur tað umsjónarráðið, sum nú er um at verða valt, ongantíð at virka.

Skotið verður tí upp, at nýval av umsjónarráðnum eftir hesari lóg fer fram, tá ið verandi valskeið er umliðið og í seinasta lagi 1. oktober 2000.

1. viðgerð 14. desember 1995. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 18. desember legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 7. desember 1995 og eftir 1. viðgerð tann 11. desember 1995 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið. Ein sand nevnd lekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 20. desember 1995. Samtykt at beina málið til 3. viðgerð við 23-1-0 atkvøðum.

3. viðgerð 22. desember 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 31-0-0 atkvøðum.

Lóg nr. 165 frá 22. desember 1995.
F.L. j.nr. 2560-1/90.

30 Nýval av nevndum

Ár 1995, mánadagin 11. desember legdi Atli Heinesen vegna sambandsflokkin fram setjandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at løgtingsnevndirnar, sum eru umrøddar í §§ 25 og 26 í tingskipanini verða valdar av nýggjum.
Viðmerkingar:

Tað, at tveir tinglimir hava tikið seg burtur úr hvør sínum tingbólki, fyrir við sær, at politiska samansetingin á tingi er øðrvísi nú, enn tá nevndirnar vóru valdar.

Í viðmerkingunum til § 28 í álitinum til Tingskipan Føroya Løgtings verður tilskilað: "Helst er óneyðugt at velja nevndirnar av nýggjum í valskeiðinum og hvørja ólavsøku, um ikki politiska stoðan ger, at politiska samansetingin á einhvørn hátt gerst øðrvísi, ella at ein meirilutti í løgtinginum heldur hetta vera neyðugt. Tí er ásett í greinini, at nevndir verða ikki valdar av nýggjum í valskeiði løgtingsins, ásetir løgtingssamtykt ikki, at nevndirnar skulu veljast av nýggjum."

Útgangsstøðið er, at nevndirnar, ið eru umrøddar í §§ 25 og 26 sita alt valskeið løgtingsins, uttan so er, at løgtingssamtykt ger av at velja nevndirnar av nýggjum sambært § 28 í Tingskipan Føroya Løgtings.

§ 28, samanborin við grundregluna í § 24 um, at allar løgtingsnevndir verða valdar undir einum, fyrir við sær, at nýval av nevndum bert kann fara fram av øllum nevndum og ikki støkum nevndum ella nevndarlimum burturúr.

Neyðugt er tí, at nevndarval fer fram skjótast gjørligt.

1. viðgerð 13. desembur 1995. Málið varð beint beinleiðis til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 10. mai 1996. Málið varð afturtikið av uppskotsstillaranum.

31 Løgtingsmál um broyting í skattalóggávuni v.m.

Ár 1995, ýsdagin 12. desember legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður fram soljóðandi

I.

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 1 nr 9 verður orðað soleiðis: "9) sínamillum tryggingarfeløg og endurtryggingarfeløg".

2) Í § 24 verða gjørdar hesar broytingar:

Í stk. 2 verður "nr. 8-15 " broytt til "nr. 8 - 16".

3) Í § 33 verður sum nr. 15 sett: "15) langfarasjómenn, undir fullari skattskyldu í Føroyum, kunnu í skattskyldugu inntøkuni draga frá telefonútreiðslur frá túrunum. Landsstýrið ásetur í kunngerð treytirnar fyri frádráttinum og støddina á hesum".

4) Í § 46 stk. 5 verður í síðsta pkt. skoytt uppí: "sbr. § 2 í ásetingarlógini".

5) Í § 48 stk. 2 verður "(smb. § 1 nr. 7-15)" broytt til "(smb. § 1 nr. 7-16)".

6) Í § 54 stk. 2 og § 64 verða "55%" broytt til "52%".

§ 2.

Hendu lóg kemur í gildi 1. januar 1996.

Stk. 2. Fyri tryggingarfeløg, ið gerast skattskyldug við broyting nr. 1, fer broytingin fyrstu ferð gildi fyri 1996. Ogn og skuld teirra skal við byrjan inntøkuársins setast til tey virði, ið fastsett eru í avgjaldsuppgerð felagsins pr. 31.12.1995 sambart reglunum í løgtingslóg nr. 24 frá 28.02.1956 um trygging.

Stk. 3. Við ígildissetanini av hesi lóg fara samstundis úr gildi § 3 stk. 5 og 6 í løgtingslóg nr. 24 frá 28.02.1956 um trygging og higartil galdandi danskt lógartekstur í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunutskatt.

Stk. 4. Í løgtingslóg nr. 87 frá 05.06.1992 um rentuskatt verða í § 2, stk. 2 orðini "Føroya Lívstrygging, Tryggingarsambandið Føroyar og allar deildir tess" strikað. Í § 2, stk. 3 verður orðið "tryggingarfeløg" strikað, og í § 3, stk. 1 verður orðið "tryggingarfeløgunn" strikað. Eisini fer samstundis úr gildi higartil galdandi danski lógartekstur í rentuskattalógini.

II

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 1 verður orðað soleiðis:

§ 1. Vísandi til § 54 í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verður skattur teirra, ið nevnd eru í § 1 nr. 1 - 6 og § 2, stk. 1 litra d, e og f í sama lóg til landskassan ásettur soleiðis:

Er inntøkan minni enn 22.500 kr. verður latið 0 %

Er inntøkan kr.	men minni enn kr.	verður latið av kr.	og av restini kr.	
22.500	60.000	0	22.500	10,5 %
60.000	100.000	3.937	60.000	25,5 %
100.000	140.000	14.137	100.000	28,5 %
140.000	180.000	25.537	140.000	37 %
180.000	220.000	40.337	180.000	38 %
220.000	300.000	55.537	220.000	42,5 %
300.000		89.537	300.000	44 %

2) § 2 stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Persónur, ið er undir fullari skattskyldu sambæri reglunum í § 1 nr. 1-5 í skattalógini, og hevur fast tilhald í Føroyum, kann fyrt hvørt barnið, ið hann hevur foreldramyndugleikan yvir, drugu frá í útroknaða landsskattinum ein barnafrádrátt uppá 2.900 kr. treytað av, at barnið er undir 16 ár pr. 1.januar tí álmanakkaári, ið skattsetingin viðvíkur. Um skattskyldan ikki fevnir um heilt álmanakkaár, verður frádrátturin minkaður lutfalsliga."
3) § 2 stk. 3 verður strikað og stk. 4 verður hereftir stk. 3 og orðað soleiðis:
Er barnafrádrátturin hægri enn skatturin uttan barnafrádrátt, verður munurin útgoldin avvarðandi skattgjaldara. Útgjaldingin fer fram, tá ið skattauppgerðin fyri avvarðandi ár er gjørd og avlopsskattur annars verður útgoldin sambæri skattalógini.
4) Í § 3 stk. 2 verður "1995" broytt til "1996" og "7.400 kr." broytt til "7.800 kr."
5) Í § 3 stk. 3 verður "1995" broytt til "1996" og "10.600 kr." broytt til "11.100 kr."
6) Í § 5 verður sum stk. 3 sett:
"stk. 3. Fyri tryggingarfelóg, ið fevnd eru av stk. 1 verður skatturin ásettur til 27 % av inntøkunum til landskassan og kommunur.

§ 2.

Hendan lóg kemur í gildi 1. januar 1996, og fer samstundis higartil galdandi danski lógartekturin í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan úr gildi.

III

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskat.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 4 frá 12. januar 1995 um broyting í løgtinglóg um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verður gjørd hendan broyting:
Í § 2 verður broyting nr. 8) orðað soleiðis:
"8) er bert galdandi fyri 1995 og 1996."

§ 2.

Hendan lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

IV

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 16 frá 1. februar 1995 um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verður gjørd hendan broyting:
Í § 2 verður í pkt. 2 skoytt uppí "og 1996".

§ 2.

Hendan lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

V

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um rentuavgjald og fíggjarognaravgjald.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 15 frá 1. februar 1995 um rentuavgjald og fíggjarognaravgjald við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:
1) Í § 7 verður stk. 3 orðað soleiðis:
"Toll og Skattstovan skrívar vegna landskassan út rokning uppá fíggjarognaravgjald av ognarvinningi við forfalsdegi til tann 1. í øðrum mánaði eftir at uppgerðin er latin inn við gjaldsfreist
til 20. í mánaðinum."
2) Í § 7 verður sum stk. 5 sett:
" Tá ið uppgerð nevnd í stk. 2 verður ov seint innlatin, verður avgjaldskravið renturoknað frá tí degi, ið hevði verið forfalsdagur, um uppgerðin varð innlatin rættstundis eftir reglunum í hesi grein. "
3) Í § 8 verður stk. 5 orðað soleiðis: " Toll- og Skattstovan skrívar út rokning fyri landskassans krøv uppá fíggjarognaravgjald av virðisbrøvum við forfaldegi til tann 1. í øðrum mánaði eftir at uppgerðin er latin inn við gjaldsfreist til 20. í mánaðinum."
4) Í § 8 verður sum stk. 7 sett:
" Tá ið uppgerð, nevnd í stk 4, verður ov seint innlatin, verður avgjaldskravið renturoknað frá tí degi, ið hevði verið forfalsdagur, um uppgerðin varð innlatin rættstundis eftir reglunum í hesi grein."
5) Í § 10 stk. 1 verður sum pkt. 3 sett: " Í 1996 er fíggjarognaravgjaldið 0,50 %. "
6) Í § 12 stk. 1 verður sum pkt. 6 sett: " Í 1996 er fíggjarognaravgjaldið 0,50 % í mun til virðið á virðisbrøvunum pr. 31.12.1996. "
7) Í § 20 stk. 1, 2 og 3 verður "31. december 1995" broytt til "31. december 1996"
8) § 20 stk. 4 verður orðað soleiðis:
" Fíggjarognaravgjaldsskyldan eftir § 12 av virðisbrøvum, lesvnd av § 2 nr. 3 er í 1995 galdandi við 0,65 % í mun til virðið á virðisbrøvunum pr. 31.12.1995 og við 0,50 % í mun til virðið á virðisbrøvunum pr. 31.12.1996."

§ 2.

Hendan lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, tó koma broytingar undir nr. 1 - 4 í gildi 1. januar 1996.
Stk. 2 Við ígildissetanini av hesi lóg fer samstundis lógartíl galdandi danski lógartekturin í løgtingslóg nr. 15 frá 1. februar 1995 um rentuavgjald og fíggjarognaravgjald úr gildi.

Almennar viðmerkingar:

Politiskt hava stig verið tikin til tess at lækka um okkara høga skatta- og avgjaldstrýst.

Nøkur av hesum vóru framd í samband við seinastu fíggjarlóg.

Harumframt hevur landsstýrið mælt til munandi lækking av rentufrádráttinum, sum saman við setbúsaloysnunum hava hjálpt nakað hjá setbúsaeigarunum.

Loysnin við kommunuskuklini ger, at nógvar av okkara kommunum komandi ár lækka kommunuskattaprosentið.

Men hóast hesi tiltøk, so metir landsstýrið tað neyðugt við einum rettiliga munandi skattalætta og størri viðbøtur til ávísar pensionistar, sum verða skotin upp í hesum skattalógaruppskoti.

Broytingarnar, sum verða skotnar upp at gera í skattlóggávuni, kunnu býtast upp í fýra partar:

- tekniskar broytingar og annars aðrar neyðugar fylgibroytingar
- skattingin av Tryggingarsambandi Føroyar, øllum deildum tess og Føroya Lívstrygging
- broytingar, sum eru beinleiðis fylgjur av framlagda fíggjarlógaruppskotinum fyri 1996
- broytingar, sum fylgjur av politisku semjuni í samgongutni um at veita ein skattalætta.

Viðvíkjandi tí fyrsta partinum verður víst til viðmerkingarnar til tær ymisku lógirnar.

Við eini áseting í sjálvari tryggingarlógini hevur tryggingin skulla goldið eitt avgjald til landskassan, sum hevur verið gjørt upp eftir reglunum fyri skatting av felagum. Seinastu árini hevur tryggingin eisini goldið rentuskatt og fyri eina tíð eisini rentuavgjald og fíggjarognaravgjald.

Henda skipan hevur á ávísum økjum verið kappinaravlagandi í mun til peningastovnarnar.

Landsstýrið mælir tí til, at Tryggingarsambandið Føroyar, allar deildir tess og Føroya Lívstrygging verða gjørd skattskyldug eftir reglunum, sum eru galdandi fyri partafelog v.m.

Hetta er ein broyting, sum er avgjørd í samráð við tryggingina.

Landskassin missur við hesum uppskoti í 1996 umleið 20 mió. kr. í rentuskat og avgjaldi. Hinvegin økist felagsskatturin í 1997 við umleið 20 mió. kr.

Lógarbroytingar o.l., sum beinleiðis hava tilknýtið til fíggjarlógaruppskotið eru

- telefonfrádráttur til langfarasjómenn. Landsstýrið skal við kunngerð áseta treytir og upphæddir. Skipanin verður metin at kosta landskassanum umb. 3 mió. kr.,
- pensiónsfrádráttur verður lækkaður, soleiðis at grundupphæddin verður skattafrí, eisini um kommunuskattaprosentið er 23. Partur av hesum varð framt í fjor, og kostaði lækkingin tá umb. 6 mió. kr. Hetta stigið, ið nú verður tikið til tess at nála málinum at grundupphæddin verður skattafrí, kostar umb. 3 mió. kr.,
- frádráttur fyri umvælingar av egnum bústaði, sum hevur verið í gildi í tvey ár, verður aftur settur í gildi fyri 1996. Frádráttur er í mesta lagi kr. 20.000.
- frádráttur fyri umvælingar av egnum akfari, sum hevur verið í gildi í 1995, verður aftur settur í gildi fyri 1996. Frádráttur er í mesta lagi kr. 3.000 fyri lønarútreiðslur. Ein treyt fyri báðar hesar frádráttir er, at arbeiðið verður gjørt av meirvirðisgjaldsskrásettum arbeiðsgevara. Tiltakið hevur sum mál at stuðla handverkaravinnuna, umframt at tálma "svartum arbeiði".
  lógin um rentuavgjald og fíggjarognaravgjald verður aftur sett í gildi fyri 1996. Avgjaldssatsurin fyri innistandandi í Føroyum og fyri virðisbrøv verður settur til 0,5%. Fyri innistandandi í útlandinum eru

satsirnir ávíkavist 15% og 35% fyri persónar og felag. Viðmerkjast skal, at av innistandandi í útlandinum verður rentan eisini skattað sum vanlig inntøka.

Fíggjarognaravgjaldið verður tikið av ávíkavist rentuberandi upphæddini og av virðisbrevavirðinum.

Mett verður, at rentuavgjaldið og fíggjarognaravgjaldið gevur eina inntøku í 1996 uppá 23 mió. kr.

Viðvíkjandi broytingini í arva- og gávugjøldum skal boðast frá, at hetta uppskot verður lagt fram, so skjótt tað er liðugt og soleiðis, at broytingin kann samtykkjast í januar mánaða.

Umfram hetta, sum her er nevnt, so gjørdi samgongan 7. desember 1995 semjut um at fremja ein skattlætta v.m. pr. 1. januar 1996.

Samanlagt kostar hesin lættin landskassanum góðar 91 mió. kr.

Semja er um, at
- skattastigin verður broyttur soleiðis, at inntøkur undir kr. 220.000 fáa tann størsta lættan. Broytingin í skattastiganum kostar uml. 80 mió. kr.,
- barnafrádrátturin í landsskattinum verður hækkaður úr kr. 2.400 upp í kr. 2.900, t.v.s. ein hækking uppá kr. 500 pr. barn. Henda broyting kostar góðar 5 mió. kr.,
- viðbótin til úvísar pensjónistar (t.v.s. teir, sum hava ræt til brenni- og samskiftisstudning) verður hækkað við 3,5 mió. kr. Landsstýrið hevur í september samtykt at lækka hesa viðbót við 1,5 mió. kr., so hækkingin verður falt 5 mió. kr.
- skattahámarkið verður lækkað úr 55% niður í 52%. Henda lækking kostur landskassanum 2,5 mió. kr. og kommununum 1,5 mió. kr.

Mett verður, at hesin lættin uppá 91 mió. kr. fer í aktivitetsøking at geva uml. 10 mió. kr. í størri skattainntøkum og uml. 20 mió. kr. í størri avgjaldsinntøkum.
Harumframt er samgongan sinnd um, at fremja bygnaðarbroytingar/sparingar upp á 20 mió. kr. í 1996. Hetta arbeiðið saman við bygnaðarbroytingunum upp á tær 12 mió. kr., verður framt innan mánaðurskiftið febr/mars 1996.

Nú samgongan hevur tikið hetta stig, so er tað ikki tí, at málið, at fáa hallið burtur av fíggjarlógini, er slept. Framvegis er málið, at hallið skal burtur í 1998. Hinvegin ásannar samgongan, at okkara skattatrýst er ov høgt, og tí er neyðugt við hesum tiltaki.

Eisini verður ásannað, at barnafamiljurnar og okkara pensjónistar, sum ongat aðra inntøku hava umfram pensjónina, hava verið serliga hart raktir.

Í samgonguskjalinum varð sagt, at marginalskatturin skuldi lækkast, og láginntøkum skuldi veitast ein lætti. Marginalskatturin varð lækkaður í fjør við 28 mió. kr., og bróðurparturin av teimum 80 mió. kr., sum broytingin av skattastiganum kostar, fer til lág- og miðalinntøkur.

Lækkingin av skattahámarkinum fer vónandi at tálma fráflytingini úr hesum inntøkubólkum.

Við hesum tiltøkum fer hallið á fíggjarlógaruppskotinum at liggja á uml. 115 mió. kr.

Seinast í viðmerkingunum greiðir landsstýrið frá teimum broytingum, sum verða settar í gildi 1. januar 1996 av okkara skattainnkrevjingarskipan.

Landsstýrið hevur ásannað, at okkara innkrevjingarskipan (kumulativa) ikki hevur virkað nøktandi. Tí hevur arbeitt verið við at fáa eina skipan (adaptiva) sum ger:
- at skattatrekkið verður so javnt sum gjørligt,
- at fyribilsskattuirn verður so rættur sum gjørligt í mun til endaliga skatlin,
- at gjørligt skal altíð vera at gera eina fullfíggjaða frágreiðing um skattaútrokningina,
- at skipanin skal vera løtt at umsita og bílig í rakstri.

At enda skal vera sagt frá, at landsstýrið í komandi ári fer at koma við einum reformi av líkningarprocessuni.

Hesin verður í hesum døgum fyrireikaður til at senda kommunalum myndugleikum til ummælis.

Broytingin í líkningarprocessini inniheldur í hovuðsheitum

- automatisering av sjálvuppgávuni (eru ongar broytingar, skal sjálvuppgáva ikki latast inn)
- automatisering av ognaruppgerðini (eru ongar broytingar, skal ognaruppgerðin ikki latast inn)
- uppgávan hjá líkningarnevndunum verður broytt. Hesar skulu ikki longur hava ábyrgdina av álíkningini. Í hvørjum av okkara seks skattaøkjum verður í staðin ein skattakærunevnd, sum verður vald av kommununum.

Viðlagt í hesum uppskoti eru talvur, sum vísa, hvørja ávirkan hesi tiltøk fáa fyri teir ymisku inntøkubólkarnar og fyri pensjónistarnar.

<u>Viðmerkingar til 1. broytingar</u> í skattalógini:

Uppskot landsstýrisins um broytingar í skattlógini eru broytingar av reglunum í § 1 nr. 9), ið viðvíkur skattskyldum hjá sínamillum tryggingarfeløgum, dagføringar av lógartekstunum í § 24, 46 og 48, broyting í § 54 og 64 vegna lækking av skattahámarkinum.

Í § 1 verður nr. 9) umorðað. Eftir galdandi § 1, nr. 9 eru tað bert sínamillum tryggingarfeløg, ið tryggja uttan at skuldbinda seg til sínamillum ábyrgd, ið eru skattskyldug eftir skattalógini. Hóast hetta, so hevur Tryggingarsamband Føroya við áseting í tryggingarlógini skula rinda avgjald til landskassan, ið er gjørd upp eftir skattligum reglunum fyri felog. Sístu árini hevur tryggingin vegna teirra skattafrítøku eftir skattlógini skula rinda rentuskatt og fyri eina tíð eisini rentuavgjald og tíggjarognaravgjald. Á ávísum økjum hjá tryggingini kann hendan skipan hava verið kappingaravlagandi í mun til peningastovnarnar, og metir landsstýrið tí, at rættast er, at Tryggingarsambandið Føroyar, allar deildir tess og Føroya Lívstrygging verða gjørd skattskyldug eftir reglunum, sum galdandi eru fyri partafelog v.m. við einum skattaprosenti uppá 27%, samstundis sum tryggingin verður frítikin fyri at rinda rentuskatt. Broytingin er skotin upp at koma í gildi 1. januar 1996, og verður 1996 sostatt fyrsta árið, ið tryggingin skal gjalda vanligan inntøkuskatt. Í § 2 verður skotið upp, at byrjunarlíggjarstøðan til skattaroknskapin hjá tryggingini verður grundað á uppgerðina pr. 31.12.1995, ið tryggingin samhart tryggingarlógin skal gera í ár eins og undanfarin ár, og sum er grundarlag fyri galdandi avgjaldsskyldu teirra.

Skotið verður upp, at gera dagføringar av § 24 og § 48, so ávísingarnar samsvara við fyrr gjørdar broytingar. Í § 46 verður skotin upp ein fylgibroyting av, at reglurnar í ásetingarlógini um barnafrádrátt verða broyttar.

Í § 33 verður skotið upp at seta inn sum nr. 15) heimild til at veita langferasjómonnum frádrátt fyri telefontútreiðlsur. Uppskotið er ein ásannan av, at hesin inntøkubólkur hevur størri útreiðslur enn aðrir løntakarar til at halda viðlíka sambandið við heimamhvørvið. Landsstýrið heldur tí, at rímligt er at veita teirrum partvísan frádrátt fyri telefonútreiðlsurnar, so tær ikki verða so tyngjandi útreiðsluposturi hjá hesum løntakarnum, sum mí. Mett verður, at frádrátturin tilsamans kemur at kostað landskassanum 3. mió kr. árliga. Hildið verður tí rættast, at landsstýrið fer heimild í kunngerð at áseta nærri reglur fyri, hvørjar treytir hin einstaki skal lúka fyri at fáa rætt til frádráttin, hvussu stórur frádrátturin skal vera o.s.fr.

Í § 54 og § 64, ið m.a. innihalda ásetingar um skattahámarkið, verður skotið upp, at lækka galdandi skattahámark uppá 55% til 52%. Hendan lækking verður mett at kosta landskassanum eina inntøkulækking uppá 2,5 mió kr. og kommununum 1,5 mió. kr.. Broytingin er partur av samlaðu skattalækkingunum, ið landsstýrið skjýtur upp, og sum fyri størsta partin verða veittar sum lækkingar av galdandi skattastiga. Hesum viðvíkjandi verður víst til viðmerkingar um broytingar í ásetingarlógini.

Viðmerkingar til II. broytingar í ásetingarlógini:

Hendan lóg fevnir um áseting av skatti til landskassan, barnafrádrátt og persónsfrádrátt hjá pensionistum v.m. Í hesi lóg verður skotið upp, at gera broytingar í 1. 2.og 3. grein, ið fevnir um skattastigan, barnafrádrátt og frádráttin hjá pensionistum. Eisini verður gjørd broyting í § 5, sum fylgibroyting av, at § 1 nr. 9) í skattalógini er vorðið broytt, soleiðis at sínamillum tryggingarfeløg og endurtryggingarfeløg eru skattskyldug.

Broytingarnar, ið verða skotnar upp at gera í skattastiganum, hava við sær eina lækking í inntøkunum hjá landskassanum uppá uml. 80 mió. kr.

Í fastleggingini av skattstiganum hevur landsstýrið skipað skattastigan soleiðis, at lutfalsliga størsta skattalækkingin av teimum 80 mió fellur á inntøkur undir 220.000 kr., sum eisini eru tær inntøkur sum samlað geva størsta partin av skattinum.

Sum dømi kann gevast at:

1) inntøka uppá 100.000 kr. fær eina skattalækking uppá 3.888 kr.,
   ið er ein lækking uppá 21,57 % í mun til galdandi reglur.

2) inntøka uppá 150.000 kr. fær eina skattalækking uppá 4.838 kr.,
   ið er 14.20% lækking.

3) inntøka uppá 200.000 kr. fær 4.388 kr. í lækking,
   ið er ein lækking uppá 8,39%.

4) inntøka uppá 300.000 kr. fær 2.088 kr. í lækking.
   ið eru 2,28 % lækking í mun til galdandi landsskatt.

Í § 3 verður sum ískoyti til broytingarnar í skattastiganum skotið upp at hækka pensjónistafrádráttin soleiðis, at ein fólkapensjónistur ikki kemur at gjalda skatt av pensiónsgrundupphæddini, uttan mun til í hvørji kommunu teir búgva, um skattaprosentið ikki fer upp um 23%, sum í løtuni er kommunuskattahámarkið. Sum reglan er nú, so verður ein ikki nýttur frádráttur í landsskattinum fluttur til frádrátt í kommunuskattinum. Hækkingarnar av pensiónistafrádráttinum verða mettar at kosta landskassanum tilsamans umleið 3 mió kr.

Fyri stakar persónar verður frádrátturin hækkaður frá galdandi 10.600 kr. til 11.100 kr. og fyri hjún frá 7.400 til 7.800 kr.

Sum fylgiskjøl verða hjáløgd útroknaða dømi, ið sýna hvørja ávirkan skattalækkingin og frádráttarhækkingarnar fáa, og skjøl, ið sýna munin á galdandi og uppskotna skattastiga.

Í grein 2, ið umfatar reglurnar um barnafrádrátt, verða treytirnar fyri at veita barnafrádrátt broyttar, soleiðis at tað framyvir verður avgerandi fyri, um ein hevur rætt til barnafrádrátt, um ein er undir fullari skattskyldu í Føroyum og hevur tilhald her, og at ein hevur foreldramyndugleikan yvir barni, ið ikki hevur fylt 16 1. januar í tí ári, sum skattsetingin viðvíkur.

Í mun til galdandi reglur, har frádrátturin er tengdur at, um talan kann sigast at verða:
1) hjúnabandsbarn
2) barn uttanfyri hjúnaband, tá ið móðirin er skattgjaldarin
3) stjúkbarn
4) ættleitt barn ella fosturbarn.

er hetta ein skipan, sum fyriuttan at vera lættari at umsita, eisini er ein skipan, sum verður mett at vera tann, sum rakar rættast, so at skilja, at frádrátturin við hesum verður veittur tí persóni, sum formliga hevur

myndugleikan og harvið eisini ábyrgd yvir fyri tí barninum, eins og hesin eisini vanliga er tann, ið ber hovuðsútreiðslurnar av at hava eitt barn.

Frádrátturin verður í uppskotinum hækkaður frá galdandi 2.400 kr. til 2.900 kr., og hendan hækking kostar landskassanum umleið 5 mió kr.

Í § 5 verður ásett, at skatturin fyri tryggingarfelagini verður 2¾, og verður hetta fyrsta ferð galdandi fyri 1996.

Skotið verður upp, at broytingarnar koma í gildi 1. januar 1996.

Viðmerkingar til III og IV, broytingar í skattalógini:

Broytingarnar í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt eru uppskot um at framlongja verandi reglur um frádrátt fyri umvælingar á egnan bústað og viðlíkahaldi av akfari til eisini at vera galdandi í 1996.

Hvat viðvíkur umvælingum á egnum bústað, verður sostatt møguleiki eisini at draga frá 20.000 kr. fyri umvælingur, framdar eru í 1996. Viðmerkjast skal, at frádrátturin er avmarkaður til at vera 20.000 árliga, og fær ein skattgjaldari, ið hevur byrjað umvælingarnar eftir verandi reglum, og sum hevur møguleika fyri at framflyta frádrátt til 1996, ikki rætt til dupultan frádrátt, men kann einans draga frá 20.000 kr. í 1996.

Fyri aktarsumvælingar áseta galdandi reglur, at skattgjaldari kann draga frá 3.000 kr av lønardúreiðlsunum, ið standast av at viðlíkahalda privat nýttan persónsbil, og verður skotið upp, at hendan reglan skal halda áfram í óbroyttum lívi í 1996.

Viðmerkjast skal, at í báðum hesum frádráttum kann lønarpartarin bert dragast frá, um lønin er goldin mvg-skrásettum arbeiðsgevara.

Viðmerkingar til V, broyting í lógini um rentuavgjald og fíggjarognaravgjald:

Fyriliggjandi uppskot landsstýrisins til broytingar í lógini um rentuavgjald og fíggjarognaravgjald eru tengdar at framlagda fíggjarlógaruppskotinum fyri 1996.

Lógin um rentuavgjald og fíggjarognaravgjald kom á fyrsta sinni í gildi í 1993, tá ið táverandi landsstýri metti verða neyðugt í størri mun enn higartil at fíggja partar av fíggjarlógini við at leggja skatt á fíggjaraktiv. Lógin hevði gildi fyri seinnu helvt av 1993 og í 1994, og vóru avgjaldssatsirnir 1,9% av innistandandi í Føroyum og av virðisbrevum, 25% av innistandandi í útlandinum, og gav í 1993 og í 1994 tilsamans 183 mió. kr. Tá ið fíggjarlógini fyri 1995 varð gjørd, varð komið ásamt um at lata skipanina halda áfram, men at lækka avgjøldini til ávikavist 0,65% og 15%, seinni býtt upp til 15% fyri persónar og 35% fyri felog, og verður roknað við eini inntøku uppá 27,6 mió kr. av hesum gjøldum.

Landsstýrið mælir til at framlongja verandi lóg, so hon eisini hevur gildi fyri 1996. Avgjaldssatsurin fyri innistandandi í Føroyum og fyri virðisbrev, ið fevnd eru av lógini, er settur til 0,50% av ávikavist rentuberandi upphæddini og av virðisbrevavirðinum. Fyri innistandandi í útlandinum eru avgjaldssatsirnir ávikavist 15% og 35%, alt eftir um talan er um persónar ella felog. Við nevndu avgjaldssatsum verður lógin mett at geva landskassanum 23 mni kr. í inntøku í 1996, og verður annars víst til framlagda fíggjarlógaruppskotið hesum viðvíkjandi.

Aðrar broytingar, ið eru skotnar upp at gera í lógini, eru broytingar av rentu- og innkrevjingarreglunum, so skipanin gerst betur umsitilig hjá Toll- og Skattstovu Føroya.

Viðmerkjast skal, at tað er umráðandi, at hendan lóg verður samtykt og lýst í hampuligari tíð áðrenn ársskiftið, tá ið verandi lóg bert hevur gildi til og við 31.12.1995

Innkrevjingarskipanin

Tann sokallaða kumulativa innkrevingarskipanin er ikki í sjálvum sær áseta í skattalóggávuni, men í samband við, at Toll- og Skattstovan hevur ætlanir um at brovta sjálva innkrevjingarskipanina til komandi ár, hevur landsstýrið mett rettast at lata upplýsingar um tær broytingar, ið skattgjaldararin kemur at merkja í kravda fyribilsskattin í 1996 í samband við uppskotnu lækkingarnar av hámarkinum og skattastigunum.

Ein ávís ónøgd hevur verið við núverandi kumulativu skattaútrokningarskipan. Hóast skipanin er einføld, so hevur hon teir vansar, at hon er viðkvom fyri óregluligum útgjaldingardøgum. Fyrst í árinum er hon sera óviss, hon er sein at laga seg til varandi broytingar í inntøkuni, og hon er ov viðkvom fyri skiftandi útgjaldingarupphæddum.

Ónøgdin kemur mest av, at skipanin gevur ógvuligaójavnt skattaprosent við hvørja útgjalding sær, svingandi millum 0% og skattaloftmarkið 55%. Fyri at bøta uppá hetta varð tann sokallaði dempari tikin í brúk. Hann avmarkar frávikið í skattaprosentinum fyri hvørja útgjalding sær til í mesta lagi +/- 5% frá miðalskattaprosentinum.

Vansin við hesum "dempara" er, at hann í summum førum er orsøk til, at skattaprosentið ikki fær verið nóg lágt ella nóg høgt, soleiðis at skattgjaldarin kann koma út fyri at fáa óneyðuga stóran frestandi skatt ella avlopsskatt.

Ein av størstu vansunum við verandi skipan er, at sjálvt um ein skattaborgari boðar skattavaldinum frá, at inntøkan kemur at lækka ella lækka í framtíðini, og at hann vil hava sín skatt broyttan til nýggju fyritreytirnar, er ikki møguligt hjá skattavaldinum at gera broytingar í skipanini, sum kunnu ganga teimum broyttu fyritreytunum hjá skattaborgarantum á møtið.

Hjá einum skattaborgara at fáa sum svar frá skattavaldinum, at tað onki kann gera við hansara upplýsingar, tí ongar broytingar kunnu leggjast inn í skipanin, er ikki nøktandi svar at geva skattaborgaranum.

Hetta hevur givið óneyðuga nógvar "øsenjur" millum skattaborgaran og fyrisitingina, serliga um hann við árslok fær munandi frestandi skatt.

Ymiskar royndir hava verið gjørdar fyri at finna aðra skipan. Umlugsað hevur verið ein skipan við føstum skattaprosenti, sum verður ásett áðrenn árið byrjar, men kanningar hava víst, at slík skipan hevði givið 2,2 ferðir størri avlopsskatt, og 2,3 ferðir størri frestandi skatt enn verandi skipan. Skattaeftirstøðurnar hovdu vaksið munandi.

Arbeitt hevur verið eina tíð við aðrari skipan.

Uletta arbeiði hevur havt sum fyritreyt,

- at skattatrekkið skal vera so javnt sum gjørligt,
- at samlaði skatturin skal vera so rettur sum gjørligt í mun til endaliga skattin,
- at gjørligt skal vera altíð at gera eina fullfíggjaða frágreiðing um skattaútrokningina, og
- at skipanin skal vera løtt at umsita og hílig í rakstri.

Tann nýggi útroknningarhátturin, ið valdur er, verður nevndur tann adaptivi (sjálvtillagandi), tí hann tillagar seg sjálvan eftir inntøkuviðurskiftunum hjá tí einstaka skattgjaldarantum. Sjálv útroknningin verður gjørd á ein líknandi hátt sum í núverandi skattaskipan. Sannanumtikið lýkur henda skipan setu krøvini.

Nýggja skipanin framroknar ársinntøkuna við einum roknihátti, sum er grundaður á samlaða inntøku tíðartil pluss væntaða miðal dagløn rest av ári.

Skattaprosentið verður nógv javnari enn við verandi skipan. Tann meirskattur, ið verður tikin av einari meinútgjalding, verður munandi lægri enn við gomlu skipanini. Tá árið er lokið, verður skatturin í mongum føri nógv rættari enn við núverandi skipan.

Umsitingin av skipanini fer at verða lættari enn við verandi skipan, tí at minni orsøk verður hjá skattaborgaranum at venda sær til skattafyrisitingina fyri at spyrja um skattin av tí einstøku útgjaldingini, tá skattaprosentið nú verður nógv javnari.

Tann kanska mest týðandi broytingin í mun til verandi skipan er, at nú verður møguleiki hjá fyrisitingini at fara inn í skattaútrokningina og gera broytingar, tá skattaborgarin boðar frá munandi broyting í inntøkuviðurskiftunum. Hetta kann ikki lata seg gera í verandi skipan, sum hevur verið ein av størstu vansunum við henni.

Nýggi útrokningarhátturin er samanborin við verandi skipan við nøkrum dømum:

1. jøvn inntøka, men skiftandi útgjaldslagar, gevur beilt javnt skattatrekk og betur endaligt úrslit.

2. jøvn inntøka, sum fellur munandi seinna hálvár. Verður ikki boðað frá um hetta, fellur skattaprosentið javnt og kemur so í fasta lagu. Endaliga úrslitið er væl betur enn við verandi skipan. Her kann skattaborgarin nú boðað frá inntøkufallinum, sum m.a. kann vera av arbeiðsloysi, og skipanin kann so tillagast broyttu fyritreytunum.

3. Jøvn inntøka, sum veksur munandi seinastu 4 mánaðirnar. Skattaprosentið veksur javnt restina av árinum, um ikki verður fráboðað, og endaliga úrslitið er væl betur enn vi verandi skipan. Her kann skattaborgarin eisini boða frá broyttu fyritreytunum, so skipanin kann tillagast beinanveg.

4. Hjá persóni við aðrari inntøku umfram pensión, gevur skipanin nógv javnari skattaavrokning við hvørja útgjalding sær enn verandi skipan.

5. Fyri vikuløn við skiftandi útgjaldingum alt árið gevur skipanin at kalla javnan skatt alt árið.

Tað sum lýtir skipanina er, at frároknningin av inntøkuni ikki er so einføld sum í verandi skipan, tí verður neyðugt at gera eina einfalda frágreiðing um sjálva frároknningina av ársinntøkuni, men tað verður eisini gjørligt at skriva alla útrokningina út punkt fyri punkt til tey, sum hava áhuga fyri hesum.

Tá landsstýrið hevur mett, at henda frammanfyri í stuttum umredda adaptiva (tillaga) skipan loysir fleiri av trupulleikunum við verandi skipan, hevur tað samtykt at seta hana í gildi frá 1. januar 1996.

Er inntøkan	men minni enn	verður latið	av	og av restini
kr.	kr.	kr.	kr.	
22.500	60.00	0	22.500	10,5%
60.000	100.000	3.937	60.000	25,5%
100.000	140.000	14.137	100.000	28,5%
140.000	180.000	25.537	140.000	37%
180.000	220.000	40.337	180.000	38%
220.000	300.000	55.537	220.000	42,5%
300.000		89.537	300.000	44%

Inntøka	Munur í krónum	Munur í pct	Inntøka	Munur í krónum	Munur í pct
22.500	0	0,00	210.000	4.238	7,57
30.000	338	30,01	220.000	4.088	6,86
36.000	608	30,01	230.000	3.838	6,03
40.000	788	30,00	240.000	3.588	5,31
50.000	1.238	30,00	250.000	3.338	4,66
60.000	1.688	30,00	260.000	3.088	4,08
70.000	2.238	25,65	270.000	2.838	3,56
80.000	2.788	23,58	280.000	2.588	3,09
90.000	3.338	22,36	290.000	2.338	2,67
100.000	3.888	21,57	300.000	2.088	2,28
110.000	4.138	19,59	310.000	2.088	2,17
120.000	4.388	18,11	320.000	2.088	2,08
130.000	4.638	16,97	330.000	2.088	1,99
140.000	4.888	16,07	340.000	2.088	1,91
150.000	4.838	14,20	350.000	2.088	1,84
160.000	4.788	12,69	360.000	2.088	1,77
170.000	4.738	11,45	370.000	2.088	1,71
180.000	4.688	10,41	380.000	2.825	2,23
190.000	4.538	9,32	390.000	4.025	3,07
200.000	4.388	8,39	400.000	5.225	3,85

		Giftur	Leystur	
Vanlig pensjón	Grunnupphæð	3.164	3.982	
	Viðbót	584	735	
	Ialt	3.748	4.717	Skattskyldugt
	Ialt til skatting	3.748	4.717	
Miðal avlamispensjón		1.589	1.855	Ikki skatlskyldugt
	Ialt	5.337	6.572	
	Ialt til skatting	3.748	4.717	
Hægsti avlamispensjón		1.860	2.571	Skattskyldugt
	Ialt	7.197	9.143	
	Ialt til skatting	5.608	7.288	

Kommunuskatta-% er 16

	Inntøka	Skattur 1995	Uppskot	Munur
Leystur				
Vanlig pensjón	56.604	1.651	0	1.651
Miðal avlamispensjón	56.604	1.651	0	1.651
Hægsti avlamispensjón	87.456	15.583	11.888	3.695
Krígspensjón	167.784	54.842	49.598	5.249

Kommunuskatta-% er 19

	Inntøka	Skattur 1995	Uppskot	Munur
Leystur				
Vanlig pensjón	56.604	2.989	954	2.035
Miðal avlamispensjón	56.604	2.989	954	2.035
Hægsti avlamispensjón	87.456	17.845	14.150	3.695
Krígspensjón	167.784	59.518	54.269	5.249

Kommunuskatta-% er 23,5

	Inntøka	Skattur 1995	Uppskot	Munur
Leystur				
Vanlig pensjón	56.604	4.996	2.961	2.035
Miðal avlamispensjón	56.604	4.996	2.961	2.035
Hægsti avlamispensjón	87.456	21.238	17.543	3.695
Krígspensjón	167.784	66.525	61.275	5.250

Kommunuskatta-% er 16

	Inntøka	Skattur 1995	Uppskot	Munur
Giftur				
Vanlig pensjón	44.976	1.224	0	1.224
Miðal avlamispensjón	44.976	1.224	0	1.224
Hægsti avlamispensjón	67.296	9.289	6.805	2.484
Krígspensjón	157.968	52.902	47.704	5.198

Kommunuskatta-% er 19

	Inntøka	Skattur 1995	Uppskot	Munur
Giftur				
Vanlig pensjón	44.976	2.211	803	1.408
Miðal avlamispensjón	44.976	2.211	803	1.408
Hægsti avlamispensjón	67.296	10.945	8.461	2.484
Krígspensjón	157.968	57.279	52.081	5.198

Kommunuskatta-% er 23,5

	Inntøka	Skattur 1995	Uppskot	Munur
Giftur				
Vanlig pensjón	44.976	3.691	2.283	1.408
Miðal avlamispensjón	44.976	3.691	2.283	1.408
Hægsti avlamispensjón	67.296	13.429	10.845	2.584
Krígspensjón	157.968	63.845	58.646	5.199

1. viðgerð 14. desember 1995. Málið var beint í fíggjarnevndina, sum 18. desember 1995 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 12. december 1995 og eftir 1. viðgerð tann 14. december 1995 beint í fíggjarnevndina.

Málið fevnir um trýggjar broytingar í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt, um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan, og um broyting í løgtingslóg um rentuavgjald og fíggjarognarvgjald.

Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt:
Uppskot landsstýrisins til broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt fevnir um broyting, ið ger Tryggingarsambandið Føroyar, allar deildir tess og Føroya Lívstrygging skattskyldugar eftir reglunum, sum eru galdandi fyri partafelóg v.m.

Eisini verður loyvdur ein frádráttur fyri telefonútreiðsur fyri langfarasjómenn, soleiðis at hesir, um teir eru undir fullari skattskyldu í Føroyum, kunnu draga telefonútreiðslur frá túrinum frá í skattskyldugu inntøkuni.

Skattahámarkið og hægst loyvdi eftirbildni fyribilsskatturin av tí einstøku útgoldnu A-inntøkuni verður lækkaður úr 55 % til 52 %.

Lógargreinirnar um umvæling av egnum sethúsum og av egnum persónbilum verða longdar til eisini at verða galdandi fyri 1996. Frádráttur fyri umvælingar v.m. av egnum sethúsum verður loyvdur fyri í mesta lagi kr. 20.000, og frádráttur fyri umvælingar av egnum persónbili verður loyvdur fyri í mesta lagi kr. 3.000.

Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan:
Uppskot landsstýrisins fevnir um lækking av landsskattinum, og er skattastigin broyttur soleiðis, at inntøkur undir kr. 220.000 fáa tann størsta lættan.

Barnafrádrátturin verður hækkaður úr kr. 2.400 upp í kr. 2.900. Eisini er broyting gjørd, soleiðis at tað nú er tann, ið hevur foreldramyndugleikan yvir barninum, ið hevur rætt til frádráttin, og at treytin fyri at fáa barnafrádrátt er, at skattgjaldarin er undir fullari skattskyldu í Føroyum og hevur fast tilhald í Føroyum.

Pensiónsfrádrátturin verður hækkaður, soleiðis at grundupphæddin verður skattafrí uttan mun til kommunuskattaprocentið.

Fyri tryggingarfeløg, ið verða gjørd skattskyldug, verður skatturin ásettur til 27 % av inntøkunum.

Broyting í løgtingslóg um rentuavgjald og líggjarognaravgjald:
Uppskot landsstýrisins fevnir um at framlongja verandi lóg, soleiðis at hon eisini hevur gildi fyri 1996. Avgjaldssatsurin verður eisini broyttur. Fyri innistandandi í Føroyum og fyri virðisbrøv verður avgjaldssatsurin settur til 0,5 %.

Undir viðgerð í nevndini varð nevndin varug við tekniskar villur.

Meirilutin og minnilutin (Anfinn Kallsberg) seta tí fram soljóðandi

Broytingaruppskot

til

I. uppskot landsstýrisins

um løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

§ 1

Í § 2 í I. uppskoti landsstýrisins verður gjørd hendan broyting:

1) Í § 2 verður sum nýtt stk. 5 sett:
"Avgjøldini, ið verða kravd eftir lógunum, nevndar í stk. 3 og 4, fyri tíðarskeiðið til og við 31. december 1995, skulu avroknast eftir higartil galdandi reglum um avrokning."

Orsøkin til, at nevndin setir fram hetta broytingaruppskotið, er, at tey omanfyri nevndu avgjøld fyri 1995 verða avroknað í 1996. Rættast er tí at præcisera, at heimild er fyri avrokningini av hesum avgjøldum.

Broytingaruppskot

til

III. uppskot landsstýrisins

Í § 1 í III. uppskoti landsstýrisins verður skoytt uppí: "Fyri arbeiði, ið eru byrjað í 1995, kann herumframt loyvast ein frádráttur upp á í mesta lagi 20.000 kr. fyri 1996."

Nevndin metir, at rættast er at gera eina yvirgangsreglu fyri tey, ið hava ígongdverandi arbeiði ultimo 1995. Tó skulu hesi eisini hava møguleika at nýta frádráttin, hetta uppskotið ásetir.

Undir viðgerðini hevur nevndin annars býtt seg í ein meirilutu og tveir minnilutar.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Kristian Magnussen, Álvur Zachariasen, Finnbogi Ísakson, Finnbogi Arge) tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir tinginum til at samtykkja tað við omanfyrinevndu broytingum.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg) tekur undir við I., III. og IV. uppskoti landsstýrisins, og mælir tinginum til at samtykkja tey við omanfyri nevndu broytingum.

Til II. uppskot førir minnilutin (Anfinn Kallsberg) fram:
Vísandi til Fólkafloksins minnilutaálit til fíggjarlóg, er plássið fyri skatta- og avgjaldslættum uppá 160. mió. kr. og javnvág á fíggjarlógini.
Minnilutin mælir til í fyrra lagi til, at løgtingið veitir 160. mió. kr. í skattalættum, men tekur í øðrum lagi undir við teimum 90. mió. kr. í lættum, sum ein stórur meirilutu á tingi er sundur um at veita.

Minnilutin tekur undir við at lækka miðalskattahúmarkið úr verandi 55 % niður í 52 %, men átalar harliga, at marginalskattatrýstið, t.e. skatturin á seinast innvunnu krónu framvegis er 70 %. Tí tá føntakarin berr eigur 30 oyru eftir skatt av seinast forvunnu krónu, køvir tað hugin at arbeiða, tjena meira og at spara saman og gera fløgur. Minnilutin mælirístaðin løgtinginum til at samtykkja uppskot Fólkafloksins, at tríbýta skattastigan so, at lands- og kommunuskatturin verður 30 % av inntøkum millum 30.000 kr. og 130.000 kr., 40 % av inntøkum millum 130.000 kr. og 230.000 kr. og 50 % av inntøkum omanfyri 230.000 kr. við 30.000 kr. sum skattafrían botnfrádrátt. Hesum uppskotið koma vit við, um meirilutu fæst fyri fíggjarlógaruppskotið minnilutans 1996 í tinginum.

Til V. uppskot landsstýrisins førir minnilutin (Anfinn Kallsberg) fram, at hann ikki kann taka undir við hesum uppskotinum, av tí at fíggjarognaravgjaldið tekur bartur allan hug at spara upp. Fyri at fløgur verða gjørdar, er neyðugt, at vit hava uppsparing í landinum. Tí er umráðandi hjá politikkarunum ikki bert at geva fólkið fíggjarligt rúm at spara upp, men tað má eisini verða eggjandi at spara upp. Vit vita at tað er uppsparingin sum fer í fløgur, og tí eiga vit at fáa nytikið fíggjarognaravgjaldið beinanvegin. Vit eiga at kunna laga skattalættan soleiðis, at tað er rúm fyri hesum innanfyri tær 160 møguligu mió. kr., ið áður eru nevndar.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg) førir eisini fram, at hann yniskir, at uppskot I, II, III, IV og V í løgtingsmál nr. 31/1995 fara til atkvøðugreiðslu hvør í sær.

Minnilutin (Jórdur J. Niclasen) førir fram:
Skattatrýstið í Føroyum er alt ov stórt, og er hetta ein orsok til, at fólk hava sera trupult við at fáa endarnar at røkka. Eisini er skattatrýstið ein beinleiðis orsok til, at fólk flytir av landinum. Dømi um hetta eru mong.

Roknast kann ikki við, at fyriliggjandi uppskot kemur at venda gongdini. Tó má ásannast, at allur bati bølir - og er tað at fegnast yvir.

Hvat skattalætta til háinntøkurnar viðvíkur, so vil hesin minnilutin enn einaferð vísa á, at rættari var, at hesin í størri mun varð javnaður út á lág- og miðalinntøkurnar.
Havast skal í huga, at fyri ári síðani, tá skattalætti varð veittur fall hesin serliga háinntøkunum í lut.

Útrokningar vísa at t.d. inntøkur uppá kr. 1. mill. fáa 30.000 kr. í lætta, og inntøkur uppá kr. 2. mill. fáa 60.000 kr. í lætta.

Landsstýrið eigur tí nú at taka seg um reiggj, og fáa í lag eina rættvísari skattaskipan, har eisini hædd verður tikin fyri skattaviðurskiftum hjá hjúnum, soleiðis at hesi fáa møgideika fyri at flyta part av inntøkuni sínamillum til skattingar.

Hvat skattalættanum annars viðvíkur, er tað sera umráðandi at hesin kemur borgarunum til góða, og at lánistovnarnir ikki "stinga av við honum". Um hetta gerst frupulleiki, má landsstýrið taka neyðug stig.

Við hesum viðmerkingunum verður tikið undir við uppskotið landsstýrisins I, II, III og IV.

Hvat uppskoti V viðvíkur, so er sami minniluti av teirri áskoðan, at fíggjarognaravgjaldið er óheppi við atliti til uppsparingarhugin og eigur tí, soleiðis sum samgongan sigur í skjali sínum, at verða avtikið.

2. viðgerð 21. desember 1995. Uppskot landsstýrisins I-V við broytingum frá nevndini til I og III samtykt við: I 29-0-0, II 32-0-0, III 32-0-0, IV 32-0-0, V 20-2-10 atkvøðum.

3. viðgerð 22. desember 1995. Uppskotini sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við: I 31-0-0, II 30-0-0, III 31-0-0, IV 31-0-0, V 20-3-8 atkvøðum.

Løgtingslógir nr. 166, 167, 168, 169 og 170 frá 22. desember 1995.

32 Broytingar í tolllóggávuni v.m.

Ár 1995, mánadagin 11. desember legði Sámal P. í Grund, landsstýrismaður, vegna Johannes Eldesgaard, landsstýrismann, fram soljóðandi

I
U p p s k o t

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um toll.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 121 frá 23. desember 1991 um toll við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 5 verður "á Føroya Tollstovu" broytt til "frá Toll-og Skattstovu Føroya".

2) § 6, stk. 1, litra b., síðsta punktum verður orðað soleiðis:
"Landsstýrið kann við kunngerð áseta nærri reglur um, hvørjar lutir eru flytigóðs, treytir fyri innflutningi og úr hvørjum londum hesir lutir kunnu innflytast."

3) Í § 6, stk. 1, litra g. verða orðini "Ortopediskir lutir" strikað.

4) Í § 12, stk. 3 verða orðini "fríhavnir og" strikað.

5) § 14 verður orðað soleiðis:
"Virki, ið samhvørt §§ 125 og 126 í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1993 um landsskatt og kommunuskatt eru skrásett í arbeiðsgevaraskrámi, hava skyldu til at nýta skrásetingartalið í vinnuskrámi í einum og hvørjum samskifti við Toll- og Skattstovu Føroya.
Stk. 2 Toll-og Skattstovan tillutar virkjum, ið ikki hava eitt skrásetingartal smb. 1. stk.,
og sum innflyta vørur vinnuligt, eitt skrásetingartal. Talið skal nýtast í einum og
hvørjum samskifti við Toll-og Skattstovuna.
stk. 3 Sum vinnuligur innflutningur er at
skilja innflutningur við vinnuligum endamáli.
Stk. 4 Hevur virkið smb. 1. ella 2. stk. fleiri skrásetingartøl, kann Toll-og skattstovan tilluta virkinum eitt høvuðstal"

6) § 15 verður strikað.

7) § 19 verður orðað soleiðis:
"Landsstýrið setir eina kærunevnd við 3 limum, ið hava ein fjølbroyttan kunnleika til fyrisiting og vinnulívsviðurskifti.
Stk. 2 Minst ein av limunum í nevndini skal vera løgfrøðingur og ikki hava sín dagliga yrki hjá tí almenna, og verður hesin, ella eru teir fleiri, ein av hesum, formaður í nevndini.
Stk. 3 Nevndin verður vald fyri 4 ár í senn.
Stk. 4 Tann, ið hevur kært avgerð hjá Toll og Skattstovuni, kann eftir ábeitan føra sín sjónarmið munnliga fram. Í slíkum førum skal umboð fyri Toll og Skattstovuna eisini hava henda møguleika.
Stk. 5 Nevndin tekur sínar avgerðir við vanligum meirilutu. Allar atkvøður telja eins. Í førum, tá ið eingin av limunum eru samdir, er avgerð formansins avgerandi.
Stk. 6 Landsstýrinum verður heimilað at áseta nærri reglur um samsýning og arbeiðið hjá nevndini.

8) Í § 25 verður "Føroya Tollstova" broytt til "Toll- og Skattstovan".

9) Í § 28, stk. 3 verða orðini "lendingarplass v.m." broytt til "farm v.m."

10) § 28, stk. 6 verður orðað soleiðis:
"Tá ið sett verður í stovn ferðafólkamótsambond millum tollokið og stað uttanfarnds, kann tollvaldið krevja, at tað uttan kostnað fyri tollvaldið, eru hetlir við neyðugari útgerð v.m. til taks hjá tollvaldinum at gera ferðafólkaeftirlit í."

11) § 28, stk. 6 verður § 28, stk. 7.

§ 2.

Henda lóg fer gildi tann 1. januar 1996, og samstundis fer ir gildi bigartil galdandi danski lógarteksturin í løgtingslóg nr. 121 frá 23. desember 1991 um toll.

II

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi

§ 1

Í løgtingslóg nr. 120 frá 23. desember 1991 um avgjald á framleiðslu og innflutningi verða í frumskjølunum, ið nevnd eru í §§ 2 og 4 í lógini, gjørdar hesar broytingar:

1) Í frumskjali 1 til vøruskránna ganga hesir TS-vøruflokkar út: "2205.10.00-2206.00.00, avgjald 41 kr. pr. ltr., og 8421.12.00, avgjald 20%". Í staðin verður sett: "2205.10.00-2205.90.00, avgjald 41 kr. pr. ltr., 2206.00.90, avgjald 24 kr. pr. ltr., og 8421.12.10, avgjald 20%."

§ 2

Henda lóg fer gildi 1. januar 1996 og samstundis verður danski tekstur í løgtingslóg nr. 120 frá 23. desember 1991 um avgjald á framleiðslu og innflutningi settur úr gildi.

<u>Viðmerkingar til tolllógina:</u>

Talan er um smærri fylgjubroytingar, sum standast av, at bygnaðurin av toll- og skattafyrisitingini er broyttur, heruppí at Føroya Tollstova nú eitur Toll- og Skattstova Føroya og snávegis lógartekniskar tillagingar av lógartekstinum.

Broytingarnar nr. 1, 5, 6, 7, 8 eru allar fylgjur av, at Tollstovan og Líkningarráðið eru verðin løgd saman í ein stovn og í dag eita Toll- og Skattstova Føroya.

Í § 6 verður skotið upp, at strika orðið "ortopediskar lutir". Hetta kemur av, at í galdandi toll- og vøruskrá, er tollsatsurin á ortopediskum lutum 0%, og eru hesir sostatt tollfrír. Eingin grund er tí til at hava sonnar frítøku endurtikna í tolllógini, og verur tí skotið upp at gera nevndu broyting. Viðmerkjast skal tó, at ortopediskir lutir í dag rinda meirvirðisgjald, og at henda broyting ikki ávirkar hesa avgjaldsskyldu.

Í § 12, stk. 3 verða orðini "fríhavnir og" strikað. Hendan broyting er tengd at øðrum lógarupposkoti til broyting í tolllógini, ið landsstýrið í løtuni fyrreikar, og sum viðgerð fríhavnir undir einum, og sum vil viðføra aðrar broytingar í tolllógini.

Í § 28, stk. 3 verða orðini lendingarpláss brutt til farm. Broytingin er ein teksturrætting, vegna tað at verandi føroyski og danski lógartekstur ikki samsvara, og verður her sum upprunaligt ætlað innsett orðið farm ístaðin fyri lendingarpláss.

Í § 28, stk. 6 skjýtur landsstýrið upp, at altíð tá ið settar verða á stovn ferðafólkarutur millum Føroyar og útlandið, so kann tollvaldið krevja, at holir verða tok til tolleftirlit, áðrenn rutan byrjar, og at hetta skal verða uttan kostnað fyri tollvaldið. Við hesum verður tað til eina og hvørja tíð, tann í upprættar eina rutu, ið skal hava hesi viðurskifti greið, áðrenn farið verður undir rutuna.

<u>Viðmerkingar til lógina um avgjald á framleiðslu og innflutningi:</u>

Orsøkin til fyrru broytingina er, at meðan vøran "Cider" úr súreplum ella perum, ið vanliga hevur lágt

alkoholinnihald, t.d. 1,2% vol., í dag kemur undir TS-vøruflokk 2206.00.00 við einum avgjaldi uppá 41 kr. fyri liturin, hevur øl klassi II, 2,8% vol. einki gjald. Broytingin miðar soleiðis ímóti at geva "Cider" eitt avgjald, sum er meiri hóskandi fyri eina vøru við so lágum alkoholinnihaldi.

Í 1994 vóru goldnar 20.178 kr. í punktgjaldi fyri "Cider" við einum avgjaldi uppá 41 kr. Við at seta avgjaldið niður í 24 kr. missir landskassin umleið 8.000 kr., men roknast má við, at innflutningurin av "Cider" við tí lága alkoholinnihaldinum fer at vaksa, soleiðis at inntøkumissurin fellur burtur, og kanska heldur gevur størri inntøku til landskassan.

Við seinnu broyting verður mælt til, at avgjaldið uppá stórar turkitrumlur verður strikað. Hesar trumlur eru fyrst og fremst ætlaðar til stórvaskaríir, t.d. á sjúkrahúsum, almennum vaskistøðum osfr. tvs. til vinnuliga nýtslu.

Tað er ógjørligt at siga, hvussu nógvan pening landskassin missir í sambandi við, at tær stóru turkitrumlurnar ikki skulu hava punktgjald, men leggjast skal aftrat, at tað kemur ógvuliga sjáltlan fyri, at slíkar trumlur verða innfluttar. Mett verður, at avgjaldið liggur um einar 6.000 kr. fyri hvørja maskinuna, men tað ganga ár ímillum, at slíkar trumlur verða innfluttar.

Líknandi uppbýti er gjørt fyri vaskimaskinur. Skilt verður ímillum vaskimaskinur, ið taka í mesta lagi 10 kg, og vaskimaskinur, ið taka yvir 10 kg av turrum klæðum. Størru vaskimaskinurnar hava einki gjald.

1. viðgerð 13. desember 1995. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 16. januar legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 11. december 1995 og eftir 1. viðgerð tann 13. december 1995 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið á tveimum fundum, tann 4. januar 1996 og 10. januar 1996. Undir viðgerðini hevur nevndin hildið fund við landsstýrismannin í fíggjarmálum, Jóannes Eidesgaard og umboð fyri Toll- og Skattstovu Føroya.

Á fundinum varð serliga umrødd broyting nr. 10) í uppskoti landsstýrisins, sum snýr seg um hølir til tolleftirlit í samband við ferðafólk. Umboðini fyri Toll- og Skattstovuna greiddi frá, at slíkar heimildir, ið broytingin snýr seg um, hava tollvaldini í øðrum londum. Hølir til tolleftirlit skulu tó bert gerast á teimum støðum, har regluligt ferðasamband er við útheimin.

Á fundinum setti nevndin fram spurningin, um talan kundi verða um eina bíliga loysn, t.d. ein transportablan skúr, ella um talan kann verða um íløgukrøv uppá fleiri milliónur. Umboð fyri Toll- og Skattstovuna søgdu, at talan kann verða um eina bíliga loysn, og at lógin ikki skal skiljast soleiðis, at krav er um, at ein størri íløga uppá fleiri milliónir skal gerast, fyri at kunna fremja tolleftirlitið, tá skip koma inn.

Aftaná hesa frágreiðing frá umboðunum frá Toll- og Skattstovuni, kann meirlutin (Vilhelm Johannesen, Kristian Magnussen, Álvur Zacharinsen, Finnbogi Ísakson og Finnbogi Arge) taka undir við pkt. 10) í uppskoti landsstýrisins. Viðvíkjandi pkt. 10) hevur nevndin sostatt býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta. Viðvíkjandi hinum broytingunum tekur ein samd nevnd undir við landsstýrinum.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg og Tordur J. Niclasen) tekur undir við uppskoti I, § 1, punkt 1 til og við punkt 9, men tekur ikki undir við punkt 10 og 11, og verður tí biðið um, at atkvøtt verður um punktini 10 og 11 fyri seg.

Grundgevingin hjá minnilutanum fyri hesi støðutakan er, at ásetingarnar í punkt 10 kunnu hava við sær, at tollvaldið kann krevja terminalar bygdar á støðum, har ferðamannaskip leggja at.

Orðingin "at kunna krevja" er óheppin í einum lógarteksti, tá orðingin "kann" í nøkrum førum kann vera eitt krav, og í øðrum føri ikki eitt krav. Hetta verður í veruleikanum yvirlatið til tollvaldið at avgera. Uppá

fyrispurning í fíggjarnevndini segði tollvaldið, at teir ikki fara at krevja ta stóru fløguna, fyri at kunna útinna yrki sín. Men vit mugu hava í huga, at vit hava fleiri lógir og reglugerðir innan bygging, sum áseta stødd, innretting, brunaumsjón v.m., soleiðis at tað skjótt kann enda við, at eitt lítið høli til tollvaldið gerst ein stór fløga, ja møguliga so kostnaðarmikil fyrir tann, ið skal seta ferðafólkarútuna á stovn, at ætlanin av hesi orsøk fellur niðurfyri.

Tá orðingin harafturat ger, at tað er upp til tollvaldið at avgera nær hetta verður krevt, er ongin grund at geva tollvaldinum hesa heimild, og verður tí mælt frá at samtykkja punkt 10.

Minnilutin tekur undir við uppskoti I.

2. viðgerð 22. januar 1996. Uppskot II samtykt við 28-0-0 atkvøðum. At uppskot II skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð varð samtykt við 28-0-0. Uppskot I, pkt. 10 og 11, samtykt við 18-1-9 atkvøðum. Uppskot I samtykt við 29-0-0 atkvøðum.

30. januar legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Broytingaruppskot

til

3. viðgerð

Í II: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi verður gjørd henda broyting:
Í § 2 verður "1. januar 1996" broytt til "15. februar 1996".

3. viðgerð 30. januar 1996. Broytingaruppskot frá fíggjarnevndini til § 2 samtykt við 22-0-0 atkvøðum. Uppskot II sum samtykt við 2. viðgerð og brevtt endaliga samtykt við 22-0-0 atkvøðum. Uppskot I sum samtykt við 1. viðgerð endaliga samtykt við 22-0-0 atkvøðum.

Løgtingslógir nr. 4 og 5 frá 13. februar 1996.

33 Broyting í løgtingslóg um útvarpsnevnd

Ár 1995, mánadagin 11. desember legði Símoni P. í Grund, landsstýrismaður fram soljáðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um útvarpsnevnd.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 11 frá 14. februar 1957 um útvarpsnevnd sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 87 frá 13. juni 1995 verður gjørd benda broyting:
Í § 7 verður "1. januar 1996" broytt til: "1. mars 1996".

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og verður samstundis allur danski teksturin í lógini avtikin.

Viðmerkingar:

Í samband við nýggju stýrisskipanarlógina. (løgtingslóg nr. 193 frá 26. juli 1994 um stýrisskipan fyri Føroyar), hava verið gjørdar broytingar í ymsum lógum, tilfagaðar til nýggju stýrisskipanina. Lógin um útvarpsnevnd varð broytt við løgtingslóg nr. 87 frá 13. juni 1995. Í hesi broytingarlóg er áseti, at lógin um útvarpsnevnd, sum eisini er galdandi fyri sjónvarpsnevndina, eftir sum hon er, skal fara úr gildi 1. januar 1996.

Vísandi til at landsstýrið er í ferð við at tilevna uppskot til nýggjar útvarps- og sjónvarpslógir, sum ætlandi verða lidnar um stutta tíð, vil landsstýrið við hesum uppskoti mæla til, at lógin um útvarpsnevnd verður framlongd til 1. mars 1996.

1. viðgerð 13. december 1995. Málið varð beint í mentannarnevndina, sum 18. december 1995 legði fram soljáðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 11. december 1995 og eftir 1. viðgerð 13. december 1995 beint í mentannarnevndina.

Í løgtingslóg nr. 11 frá 14. februar 1957 um útvarpsnevnd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 87 frá 13. juni 1995, verður í § 7 "1. januar 1996" broytt til: "1. mars 1996". Talan er sostatt um framleiðing av lógini, meðan landsstýrið tilevnar uppskot til nýggja útvarps- og sjónvarpslóg.

Málið er viðgjørt í nevndini tann 18. december 1995, og er nevndin samd um at framleiðingja lógina til 25. mars 1995. Nevndin heldur tað vera neyðugt við hesi eyka leiðgjan av lógini vísandi til vavið av tí arbeiði, ið skal gerast.

Nevndin setir tí fram soljóðandi

Í løgtingslóg nr. 11 frá 14. februar 1957 um útvarpsnevnd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 87 frá 13. juni 1995, verður í § 7 "1. januar 1996" broytt til: "25. mars 1996".

2. viðgerð 20. desember 1995. Broytingaruppskot frá mentanarnevndini samtykt við 25-0-0 atkvøðum. Samtykt at beina uppskotið soleiðis broytt til 3. viðgerð við 25-0-0 atkvøðum.

3. viðgerð 22. desember 1995. Uppskotið sumsamtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 31-0-0 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 171 frá 22. desember 1995.

F.L. j.nr. 2251-1/91.

34 Broyting í løgtingslóg um sjónvarp

Ár 1995, mánadagin 11. desember legði Súnal P. í Grund, landsstýrismaður fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjónvarp.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 77 frá 21. mai 1982 um sjónvarp, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 85 frá 13. juni 1995 verða gjørdar hesar broytingar:
1) Sum nýggj § 13 verður sett: "Henda lóg fer úr gildi 1. mars 1996".
2) § 14 verður strikað.

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og verður samstundis allur danski teksturin í lógini avtikin.

Viðmerkingar:

Í samband við nýggju stýrisskipanarlógina, (løgtingslóg nr. 193 frá 26. juli 1994 um stýrisskipan fyri Føroyar), hava verið gjørdar broytingar í ymsum lógum, tiltagaður til nýggju stýrisskipanina. Lógin um sjónvarp varð broytt við løgtingslóg nr. 85 frá 13. juni 1995. Í hesi broytingarlóg er ásett, at lógin um sjónvarp øll sum hon er, skal fara úr gildi 1. januar 1996.

Vísandi til at landsstýrið er í ferð við at tilevna eitt uppskot til nýggju sjónvarpslóg, sum altlandi verður liðug um stutta tíð, vil landsstýrið við hesum uppskoti mæla til, at lógin um sjónvarp verður framlongd til 1. mars 1996.

1. viðgerð 13. desember 1995. Málið varð beint í mentanarnevndina, sum 18. desember 1995 legði fram soljóðandi

Á lit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 11. december 1995 og eftir 1. viðgerð 13. december 1995 beint í mentannarnevndina.

Í løgtingslóg nr. 77 frá 21. mai 1982, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 85 frá 13. juni 1995, verður sett inn nýggj § 13 áljóðandi: "Henda lóg fer úr gildi 1. mars 1996." Tafan er sostatt um framleingjan av lógini, við tað at landsstýrið tilevnar uppskot til nýggja sjónvarpslóg."

Málið er viðgjørt í nevndini tann 18. december 1995, og er nevndin samd um at framleingja lógina til 25. mars 1995. Nevndin heldur tað vera neyðugt við hesi eyka leingjan av lógini vísandi til vavið av tí arbeiði, ið skal gerast.

Nevndin setir tí fram soljóðandi

Broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

Í løgtingslóg nr. 77 frá 21. mai 1982 um sjónvarp, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 85 frá 13. juni 1995, verður í § 13 "1. januar 1996" broytt til: "25. mars 1996".

2. viðgerð 20. desember 1995. Broytingaruppskot nevndarinnar samtykt við 24-0-0 atkvøðum. Uppskotið soleiðis broytt beint til 3. viðgerð við 24-0-0 atkvøðum.

3. viðgerð 22. desember 1995. Uppskotið endaliga samtykt við 31-0-0 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 172 frá 22. desember 1995.

F.L. j.nr. 2260-1/91.

35 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

Ár 1995, mánadagin 11. desember legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður fram søljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 umlandsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verður gjørd henda broyting:

1)Sum nýggj § 29 a verður sett:

§ 29 a. Løn og onnur samsýning, sum persónur, skattskyldugur sambært § 1, nr. 1 og 2 hevur vunnið fyri arbeiði, sum Danida skipar fyri og fíggjar, kann eftir umsókn shrt. stk. 3 frítakast fyri at teljast við á skattskyldugu inntøkuna, um so er, at arbeiði fyri samsýningina er gjørt í einum menningarlandi, og persónurin er útsendur av Danida.

Stk. 2. Persónar, sum verða útsendir og løntir av fyritøkum, ið hava gjørt avtalu við Danida, eru eisini umfataðir av stk. 1.

Stk. 3. Føroya Landsstýri kann eftir umsókn frítaka persónar shr. stk. 1 og 2 fyri skatting av inntøku, sum er vunnin fyri arbeiði, ið Danida skipar fyri og fíggjar.

Stk. 4. Landsstýrið kann í kunngerð áseta nærri reglur fyri skattafrítøku eftir hesi grein, og fyri hvørji skjalprógv v.m. skulu viðleggjast umsóknini.

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir at hon er kunngjørd, og er galdandi frá 1. januar 1995 til og við 31. desember 1997.

Viðmerkingar:

Søguliga gongdin

Landsstýrið og einstøk virki hava síðstu 2-3 árini arbeitt við at menna møguleikarnar at bjóða uppá arbeiðir, sum Danida felagsskapurin skipar fyri og fíggjar. Áhugin fyri hesum møguleikunum gjørdi seg serliga galdandi, tá búskaparkreppan byrjaði at ávirka vinnuliga virksemið í landinum. Landsstýrið hevur tí innan galdandi lóggávu roynt at skapa grundarlag fyri at stuðla og menna hetta slagið av virksemið. Viðmerkjast kann, at hesar royndir meira hava verið eyðkendar sum suttsiktaðar loysnir, sum tí hava tamað virkjunum í teirra tilrættalegging, herundir ótryggleikin við at bjóða uppá arbeiðir, setan av starvsfólki v.m.

Trupulleikin fyri teir persónar, sum verða sendir út av einum føroyskum virki ella sum kundu farl sjálvir, er, at teir fáa ørvísi skattligar sømdir enn hvat teirra donsku starvsfelagar fáa, og tí ynskja teir føroysku útsendu at verða líkastillaðir við teirra donsku starvsfelagar. Í Danmark verða persónar t.e. ekspertar/firmaekspertar, sum verða útsendir til menningararbeiði fult frítiknir fyri at gjalda skatt av inntøku, sum verður vunnin í hesum sambandi. Vandi er tí fyri, at eitt føroyskt virki ístaðin setur útlendska arbeiðsmegi.

Ætlanin hjá landsstýrinum við hesum uppskotinum er tí at skapa somu skattligar fortreytir fyri teir persónar, sum verða útsendir av føroyskum vinnuvirkjum til Danidaprosjektir, sum fyri teirra donsku starvsfelagar.

Upplýsast kann, at í tíðarskeiðnum 9. 12. februar 1994 var ein donsk sendinevnd frá Uttanríkismálaráðnum í Føroyum og greiddu frá teimum skipanunum, sum føroyskt vinnulív kann gera nýtslu av innanfyri menningarhjálp v.m. Vitjanin skal eisini síggjast í sambandi við úrslitið av samráðingunum millum landsstýrið og donsku stjórnina frá 12. oktober 1993, har m.a. semja var um, at skapa eitt yvirlit yvir, hvussu donsku skipanirnar um *eksportfremme* kunnu nýtast í Føroyum.

Galdandi lóggáva og trupulleikar

Sum støðan er í dag, eru nógvir ymiskir inntøkubólkar, sum fáa ymiskar skattligar sondic, nevnast kunnu fylgjandi dømir:

- Persónar, sum arbeiða t.d. í Týsklandi og fáa frádrátt í inntokuni fyri meirútreiðstur til kost, húsaleigu, ferða- og flutningsútreiðslur og sjúkra- og vanlukkutryggingar.
- DIS-persónarnir, sum fáa eina skattfría nettoløn, sum eftir hondini svarar til eina bruttoløn.
- Sjómenn, sum sigla við donskum skipum og sum fáa frádrátt í skattinum fyri AMBI-gjald, sum hesir gjalda til Danmark.
- Feløg v.m. og persónar, sum verða frítikin frá skatting vegna vælgerandi endamál.

Hesi dømi vísa, at í dag eru nógvar ymiskar skattligar skipanir, sum eru við til at skapa tær fortreytir, sum skulu til fyri, at tað kann *loysa seg* fíggjarliga fyri føroyingar at arbeiða í útlandinum, t.d. svið í mun til teirra útlendsku starvsfelagar, ella t.d. hvat hesir alternativ uppnáa við at verða arbeiðsleysir í Føroyum.

Higartil, t.v.s. til og við 29. november 1994, eru tein persónar, sum vórðu útsendir av einum virki, sum ger menningararbeiði fyri Danida, frítiknir sambæt § 3, stk. 2 í skattalógini. Landsstýrið hevur síðani í kunngerð nr. 115 frá 23. november 1994 broytt hesar møguleikar soleiðis, at hesir persónar ikki fongur koma undir reglurnar um skattafrælsi, av tí at hesir eru óheinleiðis settir í starv av Danida. Somuleiðis metir landsstýrið, at tað vælgerandi arbeiðið, sum hugsað verður um í omanfyri nevndu heimild í skattalógini, ikki fevnir um menningararbeiðið.

Landsstýrið ynskir tí ístaðin at seta eina greiða heimild í skattalógina fyri skattafrítøku í sambandi við menningararbeiði, men bert tað menningararbeiði, sum er fyriskipað og fíggjað av Danida.

Lóggávan í londunum uttanum okkum

Í t.d. Danmark er lóggávan á hesum økinum nakað ervisi enn skotið er upp her. Á donsku fíggjarlógini verður ístaðin gjørd ein átekning í fíggjarlógartekstin (tekstanmærkninger). Sambæt átekningini kann m.a. skattafrítøka játtast til persónar, sum ein liður í altjóða menningararbeiðinum hjá Danmark.

Stutt um endamálið og nýskapanina við uppskotinum

Endamálið hjá landsstýrinum við hesum uppskotinum er m.a. at vera við til at skapa neyðugar fortreytir og karmar fyri at menna henda partin av vinnuligu møguleikunum í Føroyum og á henda hátta at minka um stóra arbeiðsloysið, sum er, og/ella forða fyri at tað veksur. Viðmerkjast kann, at tað bert eru heilt fá virkir, sum í løtuni nýta henda vinnuliga møguleikan, ella sum í heila taki eru før fyri at bjóða uppá slík arbeiði orsaka av teimum strongu krøvum, sum Danida stillar. Landsstýrið vónar kortini, at uppskotið, um tað verður samtykt, verður við til, at fleiri virkir v.m. fara at vísa hesum vinnumøguleikum áhuga.

Talan er ikki um, at landið veitir játtan á fíggjarlógini til menningararbeiði, og síðan kunnu persónar verða frítikin fyri at gjalda skatt av inntøku vunnin í sambandi við menningararbeiði.

Lógin skal umfata persónar, sum hava eina ella aðra servitan.

Landsstýrið hevur skotið upp, at lógin verður tíðaravmarkað og tí bert verður galdandi í 1995, 1996 og 1997. Hetta svarar til, hvat er galdandi við ávísum alnennum endurgjaldsskipanum v.m. Møguleiki verður tá fyri at endurskoða skipanina, og meta um tað er neyðugt, at hon skal halda áfram eftir hetta tíðarskeiðið.

Fíggjarligu avleiðingarnar av uppskotinum

Tað er trupult at meta um, hvat land og kommunur missa av skattainntøkum. Talan er sum nevnt omanfyri, um nøkur heilt fáa tilmi virkir, sum í løtuni bjóða uppá slík arbeiðir, so útfrá tí verður ikki talan um ein stóran inntøkumiss. Hinvegin sleppur landsstýrið undan at veita hesum persónum ein møguligan arbeiðsloysisstuðul v.m., og peningurin kemur á ein ella annan hátt í umfar í samfelagnum.

Viðmerkjust skal, at í ávístum førum verður ein stórur partur av inntøkunum, sum standast av at bjóða uppá slík arbeiðir, kortini skattaðar sum vanlig skattskyldug inntøka í Føroyum, av tí, at partur av fyrireikandi arbeiðinum verður gjørt í Føroyum.

Arbeiðsbyrðar í umsitingina
Um so er, at landsstýrið í kunngerð áseta nærri reglur um mannagongdir, skjalprógv v.m. er ikki ventandi, at nakað munandi meirarbeiði verður í sambandi við avgreiðslu og áfikningina av teimum persónum, sum fáa skattafrælsi.

Ummæli frá Toll- og Skattstovuni
Landsstýrið heitti í januar 1995 á Toll- og Skattstovu Føroya, um at kanna og geva landsstýrinum eitt uppskot til eina nýtulitga skipan fyri persónar, sum verða útsendir til menningararbeiði. Eftir ein fund við landsstýrismannin í fíggjarmálum varð avgjørt, at landsstýrið skuldi fáa eitt uppskot til ein lógartekst, sum landsstýrið skuldi arbeiða víðari við, og sum nú fyriliggur.

Viðmerkingar til einstøku greinarnar:

ad § 1, stk. 1. Skattafrítøkan (objektiva) er bert tengd at **persónum** undir fullari skattskyldu í Føroyum, sum gera arbeiði í menningarfondunum.

Skattafrítøkan fevnir bert um inntøka, sum ein persónur hevur vinnið fyri arbeiði, sum Danida skipar fyri og fíggjar, og tá arbeiðið er gjørt í einum menningarlandi. Orsøkin til at velja einans Danidaarbeiðir er, at Danida virkar sum ein vælskipaður altjóða felagsskapur innan fyri mennitgararbeiði.

Talan skal vera um at útsenda persónar, sum hava eina ella aðra servitan á einum øki. Persónarnir skulu tí lúka tey krøv, sum Danida vanliga stillar fyri at kunna gjøgnumføra eitt projekt.

ad § 1, stk. 2. Lógaruppskotið innfatar bæði persónar, sum gera beinteiðis sáttmála við Danida, og persónar, sum verða útsendir, og har eitt felag ella annað felag, hevur gjørt sáttmála við Danida. Her verður hugsað um entrepriseviðurskifti og undirentrepriseviðurskifti.

Tann føroyska fyritøkan kann ikki verða frítikin fyri at gjalda skatt av *sáttmálauppheldini* frá Danida. Tiltøkini skulu haldast fyri seg í rokniskapitinum.

ad § 1, stk. 3. Landsstýrið kann eftir umsókn í hvørjum einstøkum føri geva loyvi til skattafrítøku.

ad § 1, stk. 4. Frítøkan kann veitast eftir umsókn til landsstýrið. Fyri at allar umsóknir skulu fáa eina einsháttaða og fullfíggjaða viðger, verður landsstýrinum heimilað í kunngerð at áseta nærri reglur fyri, hvussu hesi mál skulu umsitast.

Til hetta er at viðmerkja, at um frítøkan ikki verður tengd at eini umsókn, er trupult m.a. at hava eftirlit við, um persónur sambæt stk. 2 hevur verið í Danidaarbeiði tað umtalaða tíðarskeiðið. Miðli verður tí til, at frítøkan er treyta av, at umsókn verður send landsstýrinum, og at skjalprógv fyri, at viðkomandi hevur verið í Danidaarbeiði skulu viðleggjast umsóknini, eitt nú avrit av pas/visum, soleiðis at prógv eru fyri, nær viðkomandi er komin inn og farin úr landinum, arbeitt er í. Eisini skal virki vátta, at persónurin hevur verið útsendur til eitt Danida-fíggjað projekt. Hetta hevur við sær, at viðkomandi persónur ikki kann *fyribilsskrásetast* við skattafrítøku av Danidaarbeiði. Danidalønin verður skattað sum vanlig inntøka, tá hon verður útgoldin gjøgnum árið. Tí skattgjaldarin prógvar, at talan er um Danidaløn og arbeiðsgevarin váttar hetta, verður eftirregulering gjørd, soleiðis at lønin ikki verður tald við í skattskyldugu inntøkuna.

ad § 2. Tíðaravmarkingarskeiðið uppá 3 ár er grundað á, at landsstýrið betur fær eftirlit við og møguleika fyri at endurskoða hesa skipanina, sum er ein av fleiri øðrum vinnuligum studulsskipanum.

Orsøkin til, at gildiskoman er sett frá *1. januar 1995*, er, at talan er um inniverandi skattár, og at sjálvuppgávan ikki er innlatin, og ein endalig áfikning tískil ikki er gjørd.

1. viðgerð 13. desember 1995. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 31. januar 1996 legði fram søtjáðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 11. desember 1995 og eftir 1. viðgerð tann 13. desember 1995 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið. Undir viðgerðini hevur nevndin hildið fund við landsstýrismannin í fíggjarmálum Jóannes Eidesgaard, og umboði fyri fíggjar- og búskapardeildina.

Nevndin heldur, at uppskot landsstýrisins er eitt gott dømi um, hvussu viðmerkingarnar til eitt lógaruppskot eiga at vera sambært § 44, stk. 2 í tingskipan Føroya Løgtings.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meirluta og tríggjar minnilutar.

Meirlutin (Vilhelm Johannesen, Álvur Zachartasen, Kristian Magnussen og Finnbogi Ísakson) tekur ikki undir við uppskoti Landsstýrisins. Meirlutin førir fram, at fyriliggjandi uppskot skapar eitt fordømi, og kann elva til eitt trýst frá øðrum bólkum um skattafrítøku. Um føroyskar fyritøkur ikki eru kappingarførðar, tá talan er um menningararbeiði, eigur Landsstýrið heldur at umhugsa eina stuðulsskipan.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg) førir fram:
Fyriliggjandi uppskot er enn ein ásannan av, at føroyska vinnulívið ikki er kappingarført.
Vit vístu á í áliti okkara til løgtingsfíggjarlógina fyri 1996, at kappingarstøðið fyri fiskiskip er ov høgt, og tí veður latin íløgustuðul. At framleiða úr frystum fiski eru vit ikki kappingarfør, tí verður latin kilostuðul. At byggja hús er ov dýrt, tí verður latin rentufrádráttur. Umvæling av húsum og bilum er ov kostnaðarmikið, tí letur landskassin frádrátt í skatttinum til hesi endamál. At byrja nýggja vinnu er ov kostnaðarmikið, tí fáa allar nýggjar vinnur 30% aftur av lønunum.

Í skipasmíði eru vit ikki kappingarfør, tí verður latin skipasmiðjustuðul, el til vinnulívið fær stuðul, vit hava FAS skipan til farmavinnu, smoltstuðul til alivinnuna, kongafiskur úr Irmingarhavinum fær eisini stuðul. Hetta og fleiri stuðulshættir aftrat er úrslitið av, at politikarar úr øllum flokkum hava staðfest, at vit mugu bøta um kappingarførið í samfelagnum.

Fólkaflokkurin hevur ferð eftir ferð víst á, at tað er neyðugt at lækka kostnaðarstøðið, fyri at vinnan aftur kann gerast kappingarfør. Vit vilja hava eina skipan, sum er galdandi fyri alt vinnulívið, soleiðis at sleppast kann burtur úr núgaldandi skipan, har politiski myndugleikin skal gera av, hvat skal hava lív lagað og koma undir eina ella aðra serskipan.

Okkara uppskot eru feiðað av borðinum hvørja ferð, hóast allir politiska flokkarnir ásanna, at okkara vánliga kappingarført orsakað av kostnaðarstøðinum er ein stórur trupulleiki.
Fyriliggjandi uppskot er enn ein serskipan fyri, at føroyskar fyritøkur skulu kunna verða við í kappingini um menningararbeiði, gjørt av Danida.

Fólkaflokkurin gongur inn fyri at skapa fyritreytirnar so góðar sum gjørligt fyri vinnuna, og tá vit ikki fáa politiska undirtøkur fyri okkara uppskotum, fara vit sum eina fyribilsloysn at taka undir við fyriliggjandi uppskoti.

Sum frálíður fara aðrir politikarar at ásanna, at eisini á vinnulívspolitiska økinum hevði Fólkaflokkurin rætt, og fara at taka undir við okkara sjónarmiðum. Tað verður møguligt at avtaka allar serskipanir, sum eru galdandi í dag.

Minnilutin (Petur Jacobsen) tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Finnbogi Arge) tekur undir við uppskoti landsstýrisins. Minnilutin førir fram, at føroyskar fyritøkur, ið gera Danida arbeiði eru verri stillaðar enn danskar fyritøkur, ið gera sama arbeiði. Landsstýrisins uppskot er við til at geva møguleika fyri, at slíkar fyritøkur gerast kappingarførar.

Út frá framanfyri standandi tekur minnilutin (Finnbogi Arge) undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 7. februar 1996. Samtykt at beina málið til 3. viðgerð við 19-1-7 atkvøðum.

3. viðgerð 13. februar 1996. Uppskotið endaliga samtykt við 19-0-5 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 16 frá 27. februar 1996.

F.L. j.nr. 2260-1/91.

36 Løgtingslóg um mánaðarligan minstaforvinning til skrásettar útróðrarmenn

Ár 1996, mánadagin 22. januar legði Heini O. Heinesen vegna tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

UPPSKOT

til

<u>løgtingslóg um mánaðarligan minstaforvinning til skrásettar útróðrarmenn.</u>

<u>§ 1.</u> Við tí endamáli at tryggja innøkur útróðrarmanna verður landsstýrinum heimilað at útgjalda mánaðarligan minstaforvinning til manning á fiskiførum á útróði á føroysku landleiðini.

<u>§ 2.</u> Manning á fiskiførum á útróði á føroysku landleiðini kann verða latin mánaðarligur minstiforvinningur til útróðrarmenn. Treytin fyri mánaðarligan minstaforvinning er, at fiskifarið hevur avreitt minst 10 ferðir seinastu 3 mánaðarnar, at manningin verður avroknað eftir útróðrarsáttmálanum, at øll veiða verður avreidd undir einum. Hetta 3 mánaðaskeiðið verður roknað soleiðis, at tað er galdandi við mánaðinum, farið verður í skipanina við "mánaðarligum minstaforvinningi" og tveir mánaðir frammanundan.

<u>Stk. 2.</u> Haraftrat eru hesar reglur galdandi:

a) At fiskifar, sum roynir við snellu ella snøri, avreiðir minst 15 kilo upp á mannin fyri hvønn veiðidag.

b)

At fiskifar, sum roynir við línu, avreiðir minst 25 kilo upp á mannin hvønn veiðidag.

<u>Stk. 3.</u> Fyri fiskifør undir 20 brt. eru hesar reglur galdandi fyri tal av manning, sum í mesta lagi hevur rætt til "mánaðarligan minstaforvinning". Fiskifør undir 10 brt. 4 menn, millum 10 og 15 brt. 5 menn, millum 15 og 20 brt. 6 menn. Av hesum kann ein vera landformaður.

<u>§ 3.</u> Um manning á útróðrarfari skal koma undir skipanina við mánaðarligum minstaforvinningi fyri útróðrarmenn, skal bátsformaðurin fyri hvønn mánað lata Løn-javningargrunni Skipsfiskimanna skrivliga fráboðan og lista yvir manning. Fráboðanin og listin yvir manningina skal vera Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna, undirskrivað av manning og bátsformanni, í hendi í seinasta lagi 1. dagin í mánaðanum, ætlanin er at koma undir skipanina, tó fyrsta ferð í seinasta lagi fimm dagar eftir, at lógin er lýst.

<u>§ 4.</u> Mánaðarligur minstaforvinningur til útróðrarmenn er 70% av eini minstuløn kr. 12.725,00 = kr. 8.907,50 um mánaðin. Um mánaðarligur minstiforvinningur, fiskipartur og onnur inntøka hjá útróðrarmonni samanlagt fer upp um kr. 12.725,00 um mánaðin útgoldið verður fyri, verður minstiforvinningurin minkaður við sama krónutali, sum øll inntøkan fer upp um kr. 12.725,00.

<u>§ 5.</u> Um avloysari ella nýggjur maður kemur við á fiskifar fyri annan mann, ella um maður fer av fiskifarinum, fráboðar bátsformaðurin í mánaðar uppgerðini Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna

hvørjar dagar, viðkomandi maður skal hava minstaforvinning fyri.

§ 6. Mánaðarligur minstiforvinningur til útróðrarmenn verður avroknaður mánaðin eftir, at hann er vunnin, so skjótt sum mánaðaruppgerðin er innkonnin.

§ 7. Útróðrarmenn velja sjálvir, um teir koma undir hesa skipan, mynstra ella fáa minstaforvinning eftir gomlu skipanini.

§ 8. Henda lóg fær gildi 1. januar 1996.

Viðmerkingar:

Við tí endamáli at tryggja útróðrarmonnum ein mánaðarligan minstaforvinning, sum svarar til 70% av einj minstaløn utan dagsstudning hjá mynstraðum útróðrarmonnum, er ætlanin at leggja ein innløkubotn í staðin fyri dagligan minstaforvinning. Minstalønin er í dag kr. 12.725,00 um mánaðin. 70% av hesum gevur kr. 8.907,50.

Ein líknandi skipan hevur verið royndur tvær ferðir áður. Fyrru ferð var henda skipan í gildi frá 1. mars til 30. apríl 1994. Seinnu ferð var henda skipan í gildi frá 1. november 1994 til 28. februar 1995. Tað vil siga í 6 mánaðir tilsamans.

Kostnaðurin av hesum hevur verið eftir upplýsingum frá Lønjavningargrunni Skipsfiskimanna:

Februar-mars 1994	kr. 3.835.138,41
november-december 1994	kr. 3.349.871,38
januar-februar 1995	kr. 4.318.202,86
Tilsamans	kr. 11.503.212,65

Tað vil siga, at skipanin sostatt skuldi komið at kosta niðanfyri tvær miljónir um mánaðin, serliga tá hugsað verður um, at tað er meira at fáa av fiski nú enn undanfarnu tíðarskeið.

Til samanberingar kann nevnast, hvat minstiforvinningurin kostaði í 1994 og 1995.

Upphæddin fyri 1994 er	kr. 15.129.394,98
- - 1995 er	kr. 14.369.564,43,

fyri 1995 kemur møguliga eitt sindur aftrat.

Tølini fyri teir útróðrarbátar, sum mynstra eftir sáttmálanum hjá Føroya Fiskimannafelag, eru hesi:

				1994	1995
Minstaløn línubátar	yvir	20 brt.	kr.	1.403.027,08	2.892.679,23
Dagsstudningur			-	968.402,23	2.144.184,48
Minstaløn snellubát.	-	20 brt.	-	4.648.382,29	5.641.335,83
Dagsstudningur			-	3.860.688,86	4.996.351,62
Minstaløn snellubát.	undir	20 brt.	-	525.194,17	557.895,91
Dagsstudningur			-	304.331,69	411.215,24
			kr.	11.710.026,32	16.643.662,31

Tølini fyri 1995 eru frá 29.12.95, so her kann roknast við, at eitt sindur kemur aftarat, sum ikki er búkað.

Hugsanin við mánaðarligum minstaforvinningi til skrásettar útróðrarmenn er at leggja ein innløkubotn í staðin fyri ein dagligan minstaforvinning. Skipanin við dagligum minstaforvinningi ger tað neyðugt við einum høgum túratali í staðin fyri at reka útróður eftir streym- og veðurlíkindum.

Fyrimunurin við hesi skipanini er, at útróðrarmenn verða skrásettir. Um vit í staðin fyri hava dagligan minstaforvinning, er tað ikki so væl gjørligt at siga, nær ein útróðrarmaður gjørdist arbeiðsleysur. Hetta ger, at útróðrarmenn kunnu gerast líka fyri lógini í samband við arbeiðsloysi.

Hetta hevur verið serliga trupult hjá teimum, sum sjálvir eiga bátin. Tað hevur ikki verið møguligt hjá besum at komið undir arbeiðsloysistryggingina, sjálvt um besir skulu gjalda bæði fyri fiski- og bátsparin til hesa

skipan. Um hesar báðar lógirnar verða samskipaðar, skuldi tað verið gjørligt at loyst henda trupulleika.

Sama kann sigast um lógina um "vinnuligan fiskiskap" og lógina um "stuðul til feskfiskaflotan". Her er í báðum førum skrásetingin ikki í lagi. Í samband við lógina um íløgustuðul er kunngerð nr. 170 frá 21. september 1993 galdandi. Har er talan um eitt A-veiðuloyvi undir 20 brt. Hetta eru teir, sum fáa íløgustuðul. Eftir lógini um "vinnuligan fiskiskap" verða bátar undir 20 brt. allir skrásettir líka. Tað vil siga, at eingin munur er á teimum, sum reka vinnuligan útróður og teimum, sum bert fiska til húsbrúk. Tað er umráðandi, at flotin er so neyvt skrásettur sum gjørligt, og at umtalaðu lógir verða samskipaðar.

Eftir nýggju stýrisskipannarlógini skuldi tað verið landsstýrið, sum kom við uppskoti um neyðugar broytingar, men frá teimum kemur einki. Tí loyva vit okkum at seta hetta lógaruppskotið fram til tingsins viðgerð.

1. viðgerð 30. januar 1996. Málið varð beint í vinnunevndina, sum 8. mai 1996 legði fram soljóðandi

Á l i t

Málið er lagt fram av tjóðveldisflokkinum tann 22. januar 1996, og eftir 1. viðgerð tann 30. januar 1996 beint í vinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Henrik Old, Jákup Joensen, Óli Jacobsen og Álvur Zachariasen) vísir á løgtingsmál nr. 80/1995: Løgtingslóg um mánaðarminstuløn til útróðrarmenn og setir einki uppskot fram í fyriliggjandi máli.

Minnilutin (John Petersen, Heini O. Heinesen og Lasse Klein) vísir á skriv frá Meginfelag Útróðrarmanna í samband við lógaruppskotið frá tjóðveldisflokkinum. Sum inntøkutrygd hjá útróðrarmonnum hava vit havt eina minstuforvinningsskipan. Eisini hava vit seinastu tvey árini havt eina royndar minstulønarskipan.

Minnilutin setur fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

<u>uppskot tjóðveldisfloksins</u>

1) § 2, stk. 2, undir a) verður orðað soleiðis: "At fiskifarið avreiðir minst 15 kg uppá mannin fyri hvørja veiðuferð."

2) § 2, stk. 2, undir b) verður orðað soleiðis: "Egningarløn kann ikki frádragast, um báturin er fullmannaður sambært § 2, stk. 3."

3) Í § 2, stk. 3, ganga út orðini "Av hesum kann ein vera landformaður", og í staðin verður sett. "Av hesum kunnu tveir vera heimaegnarar."

4) § 4 verður orðað soleiðis: "§ **4.** Mánaðarligur minstiforvinningur til útróðrarmenn er 70% av eini minstiløn, í løtuni kr. 8.907.50 um mánaðin. Um mánaðarligur minstiforvinningur og fiskipartur hjá útróðrarmonnum samanlagt fer upp um galdandi minstuløn, mánaðin útgoldið verður fyri, verður minstiforvinningurin minkaður við sama krónutali, sum minstaforvinningurin plus fiskiparturin fer upp

um galdandi minstuløn. Øll onnur inntøka forvunnin á landi, skal mótroknast beinleiðis frá mánaðarliga minstaforvinninginum."

5) Í § 6 verður skoyt uppí eftir síðsta punktum: "Við mánaðaruppgerðini skulu útreiðslurnar skjalprógvast."

6) § 7 verður strikað.

7) § 8 verður § 7.

Viðmerkingar til tey ymisku broytingaruppskotini.

1. Av tí at skipanin verður galdandi fyri allar bátar sum annars ikki mynstra, fyri hvørja avreiðing sær, er ikki neyðugt at hava meira enn tað eina kilotalið soleiðis at menn sjálvir ráða fyri hvørjum reiðskapi teir nýta.

2. Tá ið bátur hevur hægst loyvda manningartal, og loyvi verður givið til at tveir mans kunnu verða í landi, eiga útreiðslurnar fyri egning at vera íroknaðar.

3. Tá róð verður við línu er onki óvanligt, at 2 mans, sum hoyra til bátin, eru heima og skipa fyri egningini.

4. Trupulleikin við at minstaforvinningurin ikki hevur virka sum verulig inntøkutrygd hjá teimum, ið bert rógva út, hevur verið, at øll 1100-1200 veiðiloyvini hava rætt til minstaforvinning. Við at mótrokna hvørja krónu forvunnin á landi í mánaðar minstaforvinninginum, koma bert teir, ið hava útróður til vinnuveg at mynstra. Tá ein líð er fráliðin, kann skrásetast, hvør er útróðarmaður.

5. Mælt verður til at seta allar lógir og fyriskipanir um minstaforvinning úr gildi, tá henda lóg verður lýst.

2. viðgerð 13. mai 1996. Broytingaruppskot minnihlutans varð samtykt við 14-0-11 atkvøðum. Samtykt við 15-1-9 atkvøðum at beina málið soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

Heini O. Heinesen, Henrik Old, Jákup Joensen, Óli Jacobsen John Petersen, Álvur Zachariassen og Jákup Olsen løgdu fram soljóðandi

Broytingaruppskot

til

3. viðgerð

§ 7 verður soljóðandi:

"**§ 7.** Henda lóg fær gildi 1. juni 1996."

14. mai 1995 varð loyvi tingsins fingið at víkja frá tíðarfreistini millum 2. og 3. viðgerð. Samtykt við 29-0 atkvøðum.

3. viðgerð 15. mai 1996. Broytingaruppskotið varð samtykt við 28-1-0 atkvøðum. Málið sum samtykt við 2. viðgerð og broytt við 3. viðgerð endaliga samtykt við 27-2-0 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 81, 28. mai 1996.

37 Fyrivarni við gjalding av rentuni av bankaskuldini

Ár 1996, mánadagin 22. januar legði Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður vegna seg sjálvan og løgtingsmenninar Arfinn Kallsberg, Alv Zachariasen, Kristian Magnussen, Finnboga Ísakson, Tord J. Niclasen og Finnboga Arge fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at fyrivarni verður tikið viðvíkjandi tí partinum av renturnum av skuldini til danska statin, sum stavar frá bankabjargingunum, og sum landskassin skal gjalda, meðan bankamálið verður kannað.

Viðmerkingar:

Víst verður til álit til løgtingsmál nr. 25/1995 viðvíkjandi rentum í samband við bankaskuldina.

1. viðgerð 31. januar 1996. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 2. februar 1996 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av løgtingsmonnunum Vilhelm Johannesen, Anfinn Kallsberg, Álvur Zachariasen, Kristian Magnussen, Finnboga Ísakson, Tordi J. Nielsen og Finnboga Arge tann 22. januar 1996 og eftir 1. viðgerð tann 31. januar 1996 beint í figgjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið. **Eina samd nevnd** tekur undir við málinum, og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 7. februar 1996. Uppskotið endaliga samtykt við 22-1-0 atkvøðum.

38 Løgtingslóg um ábyrgd landsstýrisins

Ár 1996, friggjadagin 2. februar legði Axel Nolsøe, landsstýrismaður, vegna løgmann fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um ábyrgd landsstýrisins.

§ 1. Lógin viðvíkur ábyrgdini hjá løgmanni og landsstýrismonnunum fyri teirra embætisførslu.

§ 2. Løgmaður og landsstýrismenn hava ábyrgd av fyrisitingini av teim málsøkjum, sum løgd eru til teirra.

§ 3. Reglurnar í almenna partinum í borgarligu revsilógini eru galdandi.

§ 4. Tá reglurnar í borgarligu revsilógini um medvirkni til eitt lógarbrot verða nýttar, skal løgmaður ella landsstýrismaður verða metur at hava medvirkað til gerðina hjá einum undirmanni, tá

1) hann hevur verið vitandi um, at gerðin fór at verða framd, og hann hevur latið vera við at royna at forða henni,

2) gerðin hevur verið eitt neyðugt ella natúrligt miðal til at seta í verk eina avgerð, sum løgmaður ella landsstýrismaðurin hevur ábyrgdina av,

3) hann, við ikki í rímligan mun at hava fört eftirlit og ásett reglur, hevur virkað fyri, at gerðin er verðin framd.

§ 5. Ábyrgdin fyri eini av løgmanni undirskrivaðari avgerð liggur á hvørjum landsstýrismanni, ið hevur medundirskrivað, eins væl og á landsstýrismonnunum, ið á annan hátt hava medvirkað til avgerðina.

§ 6. Løgmaður ella landsstýrismaður verður revsaður, um hann tilætlað ella av grovum ósketni skúgvar til vika tær skyldur, sum liggja á honum sambært løgtingslóg um stýrisskipan Føroya ella lóggávuni annars ella starvsinnihaldi hansara.

Stk. 2. Ásetanin í stk. 1 er eisini galdandi, um so er, at løgmaður ella landsstýrismaður gevur løgtinginum skeivar ella villleiðandi upplýsingar, ella um hann, tá løgtingið viðger eitt mál, tigur við upplýsingum, sum eru av stórum týdningi fyri tingsins meting av málinum.

§ 7. Revsingin eftir § 6 er bót, hefti ella fongsul upp til 2 ár.

Stk. 2. Er brotið gjørt av ósketni, er revsingin bót ella hefti.

Stk. 3. Bøturnar verða ásettar eftir reglunum um dagbøtur í borgarligu revsilógini.

§ 8. Ásetanirnar í § 7 eru bert galdandi, um ikki harðari revsing er heimilað í aðrari lóggávu.

Stk. 2. §§ 155-157 í borgarligu revsilógini eru ikki galdandi fyri løgmann og landsstýrismenn.

§ 9. Ábyrgd eftir hesi lóg fyrnist sambært §§ 93-95 í borgarligu revsilógini. Fyrningarfreistin er tó organtíð styttri enn 5 ár.

§ 10. Viðvíkjandi endurgjaldsábyrgd í sambandi við gerðir løgmans ella landsstýrismanna eru galdandi tær vanligu reglurnar um endurgjald fyri skaða, sum

persónur í landsins tenastu hevur gjørt.

§ 11. Løgmaður ella løgtingið ger av, um viðurskifti viðvíkjandi embætisførsluni hjá **løgmanni** ella landsstýrismanni skulu latast Føroya Landfúta til kanningar og møguliga ákæru.
Stk. 2. Føroya Landfúti ger av, um ákæra skal reisast við kravi um revsing og/ella endurgjald.

§ 12. Nevningating dømir í málum sambært hesi lóg.

§ 13. Henda lóg fer gildi 29. juli 1996. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 102 frá 23. juni 1992 um ábyrgd landsstýrismanna. Brot, ið eru framd áðrenn henda lóg kemur í gildi, verða viðgjørd eftir higartil galdandi lóggávu.

Viðmerkingar:

Við løgtingslóg nr. 103 frá 26. juli 1994 um stýriskipan Føroya verður tann 29. juli 1996 farið frá kollektivum stýri til ráðharrastýri, og verður tí neyðugt at gera broytingar í lógini um ábyrgd landsstýrismanna.

§ 33 í stýriskipanarlógini sigur, at landsstýrismenninir sita fyri sínum málsøki hvør sær, og sambært § 37 í lógini hava løgmaður og landsstýrismenn rettarligu ábyrgdina av fyrisitingini av teim málsøkjum, sum løgd eru til teirra.

Eisini verður í § 37 í stýriskipanarlógini sagt, at mál viðvíkjandi rettarligu ábyrgdini verða dømd av nevningatingi, og at greiniligari reglur um ábyrgdina verða at ásetta við løgtingslóg.

Galdandi lóg um ábyrgd landsstýrismanna er lóg nr. 102 frá 23. juni 1992.

Nýggja lógin verður ikki mett at hava fíggjarligan kostnað fyri landskassan ella størri arbeiðsbyrði fyri fyrisitingina.

Landfútin og sorinskrivarin hava havt uppskotið til ummælis, og verður í viðmerkingini til § 12 víst til teirra viðmerkingar.

<u>Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:</u>

<u>ad § 1.</u> Í hesi grein verður øki lógarinnar ásett.

<u>ad § 2.</u> Við hesi grein verður ásett, at hvør landsstýrismaður einsamallur hevur ábyrgdina av teimum avgerðum, sum hann hevur tikið.

ad § 3. Her verður ásett, at reglurnar í almenna partinum í borgarligu revsilógini eru galdandi.

ad § 4. Her verður ásett, nær ein landsstýrismaður kann sigast at hava medvirkað til lógarbrot hjá einum embætismanni.

Útgangspunktið er reglurnar í revsilógini um medvirkni, men verða her bert dregnar fram triggjar umstøður, ið serliga kunnu koma upp á tal.

<u>ad § 5.</u> Í hesi grein verður ásett, at tá løgmaður hevur undirskrivað eina avgerð, so liggur ábyrgdin ikki einans á landsstýrismanni, ið hevur meðundirskrivað avgerðina, men eisini á landsstýrismonnum, ið á annan hátt hava medvirkað til avgerðina.

ad § 6, stk. 1. Henda grein svarar stórt stað til reglurnar í §§ 155-157 í borgarligu revsilógini, ið ikki eru galdandi fyri landsstýrismenn, jbr. § 8, stk. 2. Sambæt hesi grein er tað møguleiki fyri at revsa lansstýrismannin fyri eitthvørt vansketni. Hetta er ein viðkan av ábyrgdini hjá landsstýrismonnum tí tann ábyrgdaravmarkingin, ið er í § 157 í revsilógini við orðingini "grov ella ofta endurtikin misrøkt ella vansketni" ikki er við.

ad § 6, stk. 2. Eitt ábyrgd yvirfyri løgtinginum fylgir longu av stk. 1, men er víddin av ábyrgdini nágreinað her. Orðið "villleiðandi" er her komið við, tí tað í galdandi lóg er gloppið í føroyska tekstinum.

ad § 7. Her verður revsingin ásett. Revsiramman er tann sama sum í § 155 í revsilógini.

ad § 8. Her verður verður serstakliga hugsað um ásetingarnar í kap. 12, 13 og 16 í revsilógini, har heimild er fyri harðari revsing enn 2 ár.

ad § 9. Her verður ásett, at fyrningarfreistin er sambæt reglunum í §§ 93-95 í revsilógini, tó soleiðis, at hon aldri er styttri enn 5 ár. Sostatt er fyrningarfreistin aldri áti fyrr enn nýval til løgtingið hevur verið.

ad § 10. Her verður ásett, at endurgjaldsábyrgdin ikki fylgir reglunum um revsing, har landsstýrismaður ikki kann verða revsaður, um hann hevur handlað við litlum ósketni. Eftir hesum kunnu sostatt eisini gerðir gjørdar við litlum ósketni viðføra endurgjaldsábyrgd.

ad § 11, stk. 1. Her verður ásett, at tað er løgmaður ella løgtingið, sum taka stig til, at málið verður kannað, og møgulig ákæra verður reist við at senda eina áheitan til Føroya Landfúta, um at karma málið og møguliga reisa ákæru.

ad § 11, stk. 2. Her verður ásett, at tað er Landfútin einsamallur, tð ger av, um ákæra skal reisast við kravi um revsing og/ella endurgjald. Tvs. at tað eisini kann setast krav um endurgjald einsamalt.

ad § 12. Her verður ásett, at nevningating dømir í málum sambæt lógini. Í § 37 í stýriskipanarlógini verður sagt, at mál viðvíkjandi rættarligu ábyrgdini verða dømd av nevningatingi, og í viðmerkingunum til stýrisskipanarlógina (s. 191 í stýriskipanarálitinum) verður sagt, at eftir rettargangslógini § 687, stk. 2, nr. 3, verður mál um brot á skyldur landsstýrismanna dømt av nevningatingi.

Her má okkurt verða misskilt, tí samhært § 687 verða nevningar bert nýttir tá spurningurin er um fongsulsrevsing í 4 ár ella meira, um dóm til varðhald á stovni sambæt § 68 í revsilógini ella um dóm til trygdarvarðhald, jbr. § 70 í revsilógini, og tá talan er um politisk brotsverk.

Tá talan er um politisk brotsverk, er talan um brotsverk móti trygd ríkisins, stýriskipanini v.m. Her verður serstakliga hugsað um brotsverkini nevnd í kap. 12 og 13 í revsilógini, har talan í ávísum føtum kann vera um lívlanga fongsulsrevsing.

At nevningating skal dømna í málum um brot á hesa lóg, brýtur sostatt við galdandi reglur í rettargangslógini, tí eftir lógini um ábyrgd landsstýrismanna er talan í ongum føri um harðari revsing enn 2 ár.

Lógin hevur verðið til ummælis hjá Landfútanum og Sorinskrivaranum.

Landfútin metir tað vera ivasamt, um tað við løgtingslóg kann ásetast, at mál viðvíkjandi brot á lógina skulu viðgerast sum nevningasakir.

Sorinskrivarin hevur onki at viðmerkja til, at nevningating dømir í málum sambæt lógini, men heldur hann at "reglan átti kanska tó heldur ella eisini at staðið í føroysku rettargangslógini."

Eftir hesum er heimildin kanska ikki heilt greið, og eigur ein áseting um hetta tí at verða tikin við nú farið er undir arbeiðið at broyta rettargangslógina fyri Føroyar.

ad. § 13. Her verður ásett, at lógin fær gildi 29. juli 1996, tað vil siga, samstundis sum reglan í § 33 í stýrisskipanarlógini um ráðharraskipan fær gildi.

1. viðgerð 13. februar 1996. Málið varð beint í rettarnevndina, sum 8. mai 1996 legði fram søljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 2. februar 1996 og eftir 1. viðgerð 13. februar 1996 beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fleiri fundum og hevur innkallað landfútan, sorinskrivaran og Sjúrð Rasmussen, advokat, sum var við til at skriva álitið til stýrisskipannarlógina, til fundar í nevndini.

Trý ivamál eru, sum rættarnevndin serliga hevur viðgjørt. Eitt snýr seg um § 5 í heila tikið er neyðug at taka við í uppskotið, tá talan er um eina óbeinleiðis endurtøku av ásetingunum um ábyrgd samb. § 2. Næsti spurningurin viðvíkur reglunum í § 12, sum ásetir, at nevningating kann dømna í málum um brot á løgtingslógina um ábyrgd landsstýrisins. Triðja málið viðvíkur § 11 í lógaruppskotinum, sum snýr seg um, hvør skal hava heimild til at reisa ákæru í hesum málum.

Sjúrður Rasmussen hevur latið nevndini notat, har hann tekur støðu til lógaruppskotið. Hann mælir í hesum notati til, at mál, sum viðvíkja brotum á lóg um ábyrgd landsstýrisins, verða viðgjørd sum nevningamál, serstakliga við atliti til, at talan er um sonevnd politisk viðurskifti, sum eru ólík vanligum revsimálum. Eisini verður víst á reglurnar í stýrisskipanarlógini, sum greitt áseta, at slík mál skulu viðgerast av nevningatingi.

Viðvíkjandi spurninginum, um ákæran í slíkum málum, so er Sjúrður Rasmussen av tí áskoðan, at løgting ella løgmaður í tílíkum førum eiga at tilnevna ein óheftan ákæra, sum lýkur vanligu førleikatreytirnar til at átaka sær eina slíka uppgávu. Hildið verður, at ein slík skipan eisini til fulnar er í tráð við ta mannagongd, sum nýtt verður í øðrum londum í slíkum málum.

Í notatinum ger Sjúrður Rasmussen somuleiðis vart við, at § 5 tykist óneyðug, tá ábyrgd og revsireglur frammanundan eru ásettar bæði í § 2 og § 6 í løgtingslóg um ábyrgd landsstýrisins.

Nevndin hevur sent fútanum, sorinskrivaranum og landsstýrinum notatið til ummælis. Sett er fram ábeitan um, at notatið somuleiðis verður lagt avvarðandi ríkismyndugleika til hoyringar.

Rætlarnevndin hevur fingið svar frá landfútanum, sorinskrivaranum og landsstýrinum. Sorinskrivarin ger í sini niðurstøðu greitt, at hann heldur ikki, at nøkur fordring er fyri at broyta lógina samsvarandi tí, sum skotið er upp av Sjúrði Rasmussen. Føroya Landfúti er haraftarímóti stórligá í iva, um ein slík lógarbroyting er í tráð við reglurnar í rettargangslógini, har Føroya Landfúti umboðar ákæruvaldið í øllum málum. Hann mælir tí frá, at ein slík broyting verður sett í gildi, til viðurskiftini eru betur lýst, og ein endalig løgfrøðilig niðurstøða fingin til vega frá avvarðandi myndugleikum.

Landfútin hevur latið ríkisumboðnum notatið frá Sjúrði Rasmussen, og haðani er tað sent forsætismálaráðnum. Hóast fleiri áminningar er tó einki svar komið frá forsætismálaráðnum, nú tingsetan er um at vera av. Álit verður tí skrivað út frá fyriliggjandi tilfari og upplýsingum.

Nevndin heldur ikki, at § 5 í uppskoti landsstýrisins eigur at takast við í lógina um ábyrgd landsstýrisins.

Frammanundan er í § 2 greitt ásett, at løgmaður og landsstýrismenn hava ábyrgdina av teimum málsøkjum, sum løgd eru til teirra. Eingin orsøk er til at endurtaka hesar ásetingar, og reglurnar um medvirkan í revslógini eru eisini fullnøktandi, tá tað snýr seg um spurningin um at draga til svars tann, sum luttekur í ólógligari avgerð.

Viðvíkjandi spurninginum um nevningating ásannar nevndin, at brot á løgtingslóg um ábyrgd landsstýrisins er politiskt brotsverk og at rættargangslógin, § 687, ikki levnir um politisk brotsverk, sum talan er um her. Hin vegin er ásett í stýrisskipannarlógini, § 37, at mál viðvíkjandi ábyrgd landsstýrismanna verða viðgjørd sum nevningamál. Nevndin mælir tí til, at rættargangslógin fyri Føroyar verður broytt soleiðis, at heimild verður fyri, at nevningating kann døma um brot á løgtingslóg um ábyrgd landsstýrisins. Við hesum tekur nevn din sostatt undir við verandi lógaruppskoti, men heitir samstundis á landsstýrið um at taka neyðug stig til, at nevnda lógarbroyting í rættargangslógini fyri Føroyar verður framd.

Viðvíkjandi spurninginum um, hvør skal reisa ákæru í málum viðvíkjandi broti á nevndu løgtingslóg, hevur rættarnevndin býtt seg í ein **meirilutu og ein minnilutu.**

Meirilutin (Marita Petersen, Signar á Brúnni, Jógvan á Lakjuni og Ingeborg Vinther) hevur tá áskoðan, at bæði løgtingið og løgmaður endaliga eiga at hava rætt til at gera av, um ákæra skal reisast, og samstundis avgera, hvør persónur er ákæri vegna hilf almenna. Hesin ákæri eigur at vera frítur av løgtinginum, landsstýrinum, ríkismyndugleikunum, ákæruvaldinum og løgregluni, og eigur at hava sama heimildir eftir rættargangslógini, sum fútin hevur. Viðmerkt verður, at tað við løgtingslóg ber til at áseta serligan rættargangshátt, hóast rættargangslógin er danskur, av tí at tað er almennt viðurkent, at tað ber til at áseta serligan rættargangshátt innan yvirtikna lóggávu.

Minnilutin (Bjørn á Heygum, Sune Jacobsen og Lasse Klein) er ivasamur um heimildina til at seta slíkar grundleggjandi broytingar í okkara rættargangsskipan í verk. Serstakliga við atliti til, at talan er um eitt málsøki, sum enn ikki er yvirtikið sum føroyskt sermál, og at Føroya Landfúti beinleiðis mælir frá, at seta eina slíka skipan í gildi, heldur minnilutin tað vera skilubest fyribils at varðveita galdandi reglur samb. rættargangslógina, har Føroya Landfúti er ákæramyndugleiki í øllum revsirættarligum málum í Føroyum.

Minnilutin tekur tó tað fyrivarni, at um ríkismyndugleikarnir koma til ta niðurstøðu, at ein slík broyting er løgfrøðiliga haldbar og kann fremjast uttan at koma í stríð við galdandi uppbýti av yvirtiknum og ikki yvirtiknum málsøkjum, so eigur hesin spurningur at umhugsast av nýggjum, og møguligt lógaruppskot samsvarandi hesum at setast fram.

Vísandi til frammanfyristandandi mælir ein sand rættarnevnd tí til at seta fram soljóðandi

broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

§ 5 í uppskoti landsstýrisins fellur burtur. § 6 verður samsvarandi hesum til § 5, § 7 til § 6, § 8 til § 7, § 9 til § 8, § 10 til § 9, § 11 til § 10, § 12 til § 11 og § 13 til § 12.

Ein **meirluti** í rættarnevndini (Marita Petersen, Signar á Brúnni, Jógvan á Lakjuni og Ingeborg Vinther) setir somuleiðis fram soljóðandi

broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

§ 10 verður orðað soleiðis:

"Løgmaður eins vel og løgtingið kann gera av at reista ákæru viðvíkjandi broti á hesa løgtingslóg og ger samstundis av, hvør skal virka sum ákæri vegna hitt almenna í málinum.
Stk. 2. Tann av løgmanni ella løgtinginum tilnevndi ákærin hevur sonu heimildir og skyldur í málinum sum fútin/statsadvokaturin/ríkisákærin/løgmálaráðharrin hevur eftir rettargangslógini, men er ikki undirgivin nøkrum ríkismyndugleika."

2. viðgerð 10. mai 1996. Broytingaruppskot til § 10 verð samtykt við 10-0-9 atkvøðum. Broytingaruppskot til § 5 verð samtykt við 19-0-0 atkvøðum. Samtykt við 19-0-0 atkvøðum at beina málið soleiðis brevtt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 15. mai 1996. Málið endaliga samtykt við 26-0-0 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 90, 4. juni 1996.

F.L. j. nr. 111-I/90.

39 Uppgerð av føroysku uttanlandsskuldini

Ár 1996, týsdagin 13. februar legði Bjarni Djurholm, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljúðandi

Uppskot

til

samtyktar:

Heitt verður á landsstýrið at fyrireika lóg at leggja fyri løgtingið um uppgerð av føroysku uttanlandsskuldini, har uttanlandsskuld landskassans verður mótroknað kapitaliserða virði av blokkstuðulsveitingini.

Viðmerkingar:

Endamálið við uppskotinum er at loysa skuldarspurning landskassans og harvið óvissuna um hvussu skuldin skal avdrugast. Vetandi skuldarstøða er um at forkoma fortreytunum fyri framskygnum, skynsomum og støðugum politikki, tí

- at landskassaskuldin nú táttar í 7 mia (hetta er umfram komununu- og interkommunalu skuldina, sum er uml. 2,5 mia, tvs. samanlagt 9,5 mia),

- at alsamt hækkandi árliga rentubyrða landskassans nú rundar ta bálvu milliardina og at henda byrða fer at økjast munandi, tá avdrøgini falla til gjaldingar.
- at blokkstuðulin verður heilt burtur sum rakstrarískoyti til føroyska búskapin í næstum.

- at ótrygga støðan við uttanlandsskuldini ger, at skattatrýstið ikki kann lækka,

- at øll óvissan um skuldarbyrðu landskassans ger, at vinnan ikki kennir framtíðar búskaparkarmarnar og tí er sera trek at gera fløgur,

- at tað er ivasamt, sleppur gongdin ótálmað at halda fram, um Føroyar nakrantíð koma fyri seg aftur.

Uppskotið byggir á tær fíggjarligu fortreytir, sum eru karmar um føroyska búskapin, og sum løgtingið hevur ávirkan á.
Tað er bráðneyðugt, at løgtingið semist um eina loysn á hesum álvarsmáli at leggja fyri høvuðskreditor okkara. Verður blokkurin nýttur at loysa landskassan frá uttanlandsskuldini, verður gjørligt at skapa tryggar og varandi karmar um framburð í landinum.

Stóra peningaískoytið, føroyska samfelagið fær tillutað árliga úr danska statskassanum, er nú um at vera burtur orsakað av alsamt vaksandi rentuútreiðslum landskassans. Tá so landskassin í næstum harumframt skal gjalda avdrøg av ógvusligu uttanlandsskuldini, fer peningaískoytið (blokkurin) sum frálíður at verða heilt burtur sum rakstrarískoyti til landshúsarhaldið.

Upprunaliga veitti árliga refusiónin úr statskassanum føroyingum møguleika at núlíðargera samfelagið, og var statsstuðulin sostatt ein trygd fyri, at Føroyar, á flestu samfelagsøkjum eftir stutt áramál kundu javnmetast við grannalondini.

Sjónligastu positivu avleiðingarnar er vælútbygda sjúkra- almanna- og skúlaverkið. Harumframt er lønarlagið nominelt ájavnt við lønarlagið í skandinavisku londunum, sum tó hava heilt aðrar fortreytir undir samfelagsbúskapi sínum.

Fyrimunirnir av árligu veitingini eru so við og við fjaraðir burtur, tí føroyska kostnaðarstøðið, sum frá er liðið, lagaði seg til veitta ískoytið, sum eingin eginframleiðsla var aftanfyri. Sostatt hevur "gávan" úr Danmark ikki verið ókeypis. Hon hevur harafturímóti verið ein orsøkin til avlagaða føroyska búskapin, sum ongantíð hevur kunnað rættað seg til veruligu framleiðsluumstøðurnar í landinum.
Ætlanin við statsstuðlinum var at byggja út almennu funktiónirnar, men avleiðingarnar av slíkari ókeypis peningainuspræning sæst aftur í høgari príslegu, høgum kostnaðarstøði, versnandi kappingarføri og lágari eginframleiðslu.

Í framkomnum ídnaðarlondum umboðar almenni sektorurin vanliga millum 40 og 50% av samlaða framleiðsluvirðinum. Í Føroyum, har livtstøðið er ájavnt við flestu ídnaðarlondini, umboðar almenni sektorurin uml. 2/3 av samlaða framleiðsluvirðinum (BTÚ). Sostatt er búskapur okkara (lutfallið millum almenna og privata sektorin) øðrvísi innrættaður enn í teimum londum, sum vit vanliga samanbera okkum við.
Frávikini hava óivað orsøk í teirri ávirkan, sum statsstuðulin hevur á allar tættir í búskapinum.

Tað, at búskapur okkara í so stóran mun byggir á peningaískoyti uttaneftir (1/5 av BTÚ), merkir, at lønirnar samanlagt eru hægri enn framleiðslan (produktiviteturin). Hetta merkir aftur, at samsýningin fyri hvørja útinta arbeiðseind er hægri enn tað marknaðarvirði, sum verður lagt niður í hvørja framleidda eind av vørum og tænastum.
At hetta er støðan í samfelag okkara, er vælkent, tá hugsað verður um vantandi lønsemið, sum gjørdist so sjónligt í vinnuni, tá stuðulsskipanirnar vóru tiknar burtur.
Sostatt er skaptur ein innbygdur skeivleiki í samfelagsskipanina.
Tann álvarsligasta avleiðingin av, at ov høgur prísur verður rindaður fyri framleiðsluna av vørum og tænastum, er vánaliga kappingarførið mótvegis kappingarneytunum uttanlands. Fylgjurnar eru, at smærri vinnuvirki verða køvd, og tað er sera trupult at fáa lønsemi í nýggjar vinnur.
Úrslitið er eisini, at tað gerst umráðandi at hava framleiðslur, sum ikki krevja ov stóra arbeiðsorku fyri hvørja framleidda eind. Sostatt lønar tað seg best at flyta út rávøru, ella hálvfabrikata.

Í felagsyvirlýsingini (fælleserklæringen) millum ríkisstjórnina og landsstýrið frá 3. nov 1995 verður m.a. boðað frá, at blokkískoytið til føroyska samfelagið verður óbroytt fram til 1998 (svarandi til 860 mio. í 1996 kr). Haraftural er ásett at fáa endurskoðaða blokkskipan at virka eftir 1998.

Soslatt er ætlanin at halda fram eftir sama leisti tan í næstu øld.

Tað, at blokkstuðulsskipanin eyðsýnliga hevur óheppið árin á lønsemið í vinnuni, og harvið á møguleikarnar at menna eitt sunt vinnulív í Føroyum, eigur sjálvsagt at verða viðgjørt í størsta álvara, av tí at okkara sjálvræði sum vera tann er knýtt at møguleikunum at menna eitt burðardygt vinnulív.
Nú blokkstuðulsskipanin er um at hvørva í rentum og avdrøgum, eru øll tey positivu árin, sum blokkurin í sínu tíð veitti Føroyum, burtur, og samfelagsbúskapurin líður nú undir teirri avskeplandi ávirkan, sum statsstuðulin hevur á allar tættir í samfelagnum.

Størsta vandamálið hjá tjóð okkara er ógvusligu uttanlandsskuldin, sum nú mest sum øll er savnað í danska statskassanum. Við verandi vinnumøguleikum er lítið sannlíkt, at skuldin verður afturgoldin undir vanligum treytum.
Hetta er óivað øllum greitt og keuna flestu okkara politisku treytirnar, settar eru av høvuðskreditori okkara - stjórnini, sera eyðmýkjandi.
Tí eigur at verða miðað eftir eini loysn á hesum álvarsmáli, sum er virðilig fyri tvey fólk, sum hava verið í ríkisfelagsskapi so leingi, og sum áttu at staðið javnbjóðis hvørt øðrum.

Ein og hvør veiting byggir á virði, sum antin er beinleiðis vinningur av framleiðslu ella er vinningur av upphædd, ið stendur á bók. Soleiðis er eisini við blokkstuðlinum frá ríkiskassanum, sum er afturvendandi ár undan ári.
Vanligt er at áseta virðið á eini afturvendandi veiting uttan áramálsavmarking undir heitinum "kapitalisering", har stovnsfæið er tann upphæddin, sum árliga kastar av sær ásetta upphædd til útgjaldingar/nýtslu.
Givið er, at ávís óvissa er knýtt at slíkum útrokningum, tá trupuli er at áseta realrentuna neyvt. Hóast hesa innbygdu óvissu, er kapitaliserings-útrokningarhátturin góðtikin sum ásetan av stovnsvirði aftanfyri afturvendandi veitingar uttan áramálsavmarking.
Í sokallaðu Gørtz-frágreiðingini verður kapitaliseraða virðið av blokkstuðulsveitingini metti til umt. 15. mia. kr. Í øðrum tilsvarandi útrokningum, er hetta virðið ætlað at vera millum 12 og 15 mia. kr.

Við støði í teirri sannroynd, at blokkustuðulin nú allur verður nýttur at gjalda rentur og seinni eisini avdrøg við, eigur blokkurin at verða kapitaliseraður til nútíðarvirði og verða nýttur sum ein loysn á føroysku lánitrupulleikunum, har føroyska skuldin verður mótroknað kapitaliseraða virðið.
Hvussu restupphæddin (munurin millum kapitaliseraða virðið og uttanlandsskuldina) síðan verður umsitin, verður ein samráðingarspurningur millum landsstýrið og donsku ríkisstjórnina.
Skal samfelagið koma burtur úr teirri negativu ringrás, sum blokkstuðulsveitingin fremur á kappingarførið og harvið framleiðslumøguleikarnar í landinum, so eigur restupphæddin í eini endaligari uppgerð millum ríkispartarnar at verða avsett og løgd sum stovnsfæ undir føroyska búskapin.
Um ein slík loysn er politisk møgulig, kann bert verða gitt um. Spurningurin er eisini, um danska stjórnin er fús at veita restupphæddina í einum. Tað er sum vera man eisini ein likviditetsspurningur.

Um ársskiftið kom undan kavi, at nettoskuld Føroya í 1998 verður millum fýra og fimm mia. kr. Hetta hevur nógvastaðni skapt ta fatan, at skuldarspurningurin tá er ávegis loystur, og at endurreisingarpolitikkurin, sum varð skorin av donsku myndugleikunum, er eydnaður.
Hetta er ein tillagaður sannleiki. Skuld landskassans og lutvíst kommununar verður framvegis óbroytt.
Sum úrslit av vantandi lønsemium í føroyska búskapinum, verður vaksandi partur av innlánunn í peningastovnunum settur í virðisbrøv uttanlands. Hendu ognin kann sjálvsagt dragast frá brutloskuldini, men tað er villleiðandi at nýta nettoskuldina sum mátistokk fyri samfaðu skuldarstøðuna og harvið trupulleikar landskassans.
Úr annars álvara í at mótrokna skuld landskassans við áognina hjá peningastovnunum uttanlands, so kann tað ikki tulkast øðrvísi, enn at ætlanin er at ognartaka innistandandi.

Skuldartrupulleikar landskassans eru størsta hóttanin móti øllum framburði í samfelagnum. Í avtalunum higartil við donsku stjórnina, har uttanlandslánini verða umfíggjað, er trupulleikin bert skumpsiður fram í óvissuna.
Ógreiðan um, hvussu skuldin skal avdragast, ger eisini, at lítil vón fyri, at skattatrýstið kann lekka munandi.
Sleppur landskassin hinvegin undan renturbyrðunum av uttanlandsskuldini, og kósin um javnvág á fíggjarlógini hildin, verður gjørligt at veita borgarum landsins skattalætta í bundraðmilliónaklassanum - ein verulig

saltvatnsinnspræning í føroyska búskapin.

Tað er øllum greitt, at neyðugt er at fátta rekstrarkostnaðin av almenna sektorinum og samstundis veita tí almenna nýggjar førleikar, sum kunnu menna vinnulívskarmarnar. Ein vælskipaður politikkur millum rationaliseringar av tí almenna og skattalætta hevði skjótt fingið gongd aftur á samfelagið.
Tí er avgerandi neyðugt at fáa loyst landið úr skuldarhaftinum, og eigur fyrsta stigið at verða tikið av løgtinginum.
Tað er greitt, at verða ikki stig tikin at broyta gongdina nú, so avlagar samfelagið seg so nógv sum frálíður, at tað er ivasamt um Føroyar nakrantíð koma fyri seg aftur.

Í Peder Andersen frágreiðingini til donsku stjórnina - "Rapport fra Udvalget vedrørende genopretning af Færøernes økonomi" - frá okt. 1993, eru m.a. hesar viðmerkingar um landskassaskuldina (s. 29): "... landskassens gæld vil udgøre 7 mia kr ved udgangen af 1998 mod godt 5 mia kr ultimo 1993. En sådan fortsat opbygning af gæld vil efter udvalgets opfattelse indebære en væsentligt forøget risiko for, at **denne gæld ikke vil kunne tilbagebetales og muligvis end ikke forrentes**".
Og hildið verður fram: "Den samlede landskassegæld (5 mia. red.) har med andre ord nået en sådan størrelse, at det efter udvalgets opfattelse er **helt afgørende, at landskassens gældsopbygning bringes til ophør hurtigst muligt**".
Síðan er skuld landskassans støðugt vaksin, og var hon við árslok 1995 heilar 6,7 mia stór. Næsta ár rundar skuldin 7 mia. Tað kann verða skoytt uppí, at kommunala-, interkommunala- og stovnsskuldin, sum samanlagt er uml. 2,5 mia kr, ikki er íroknað landskassaskuldina.

Tað er tí eyðsýnt, at tað áliggur løgtinginum skjótast at beita á landsstýrið um at taka upp samráðingar við ríkismyndugleikarnar, har ætlan verður lagd fyri danir um loysn á ovurhonds skuld landskassans. Við støði í samráðingarúrslitinum eigur landsstýrið so at fyrireika tær ásetingar, ið krevjast fyri at fremja lóggávu á økinum.
Uppskot til loysn á trupulleikunum skal kunna hiðani, tí eitt er púra vist, at danir sláka neyvan mótvegis føroyingum, fyrr enn vit sjálvi vísa vilja og evnir at koma okkum burtur úr hóttandi fániskuldini. Neyðugt er tí við einari "føroyskari loysn".

Góðtaka danir eina stigtøku, har blokkurin verður nýttur at loysa samfelagið frá uttanlandsskuldini, verður óslitið, at gjørligt verður aftur at skapa tryggar og varandi karmar um framburð.
Besta loysnin er, at restupphæddin av kapitaliseringini verður veitt føroyska samfelagnum sum stovnsfæ. Eru danir ikki fúsir at greiða restupphæddina sum ískoyti til stovnsfæ undir føroyska búskapin, so eiga føroyskir myndugleikar at samráða seg til eina loysn, har vit undir øllum umstøðum eru leys av uttanlandsskuldini.

At enda kann verða skoytt uppí, at spurningurin um endurfinnan fyri bankabjørgingarnar eigur ikki at verða blandaður saman við uppgerðini av samlaðu skuld landskassans. Skuldu vit fingið viðhald í tí ivamálinum, verður talan um eitt lividitetsískoyti, sum fer at styrkja munandi um framtíðarútlitini her á landi.

Ískoyti til løgtingsmál nr. 39/1995

Í viðmerkingunum til málið um uppgerð av føroysku uttanlandsskuldini, eru sett høvuðstølini fyri landsog kommunuskuldina.

Hjálagt er útgreinan frá Landsbankanum av hesum tølum, sum ískoyti til viðmerkingarnar.

Heitt verður á løgtingsformannin at býta ískoytið út til løgtingslimirnar.
Á Føroya Løgtingi 22.02.96. Bjarni Djurholm

Landsbankl Føroya 22.02.96

Landskassans skuld 1990-1998

Mia kr	1990	1991	1992	1993	1994	1995	1996	1997	1998
Føroyar	0,5	0,5	0,7	0,6	0,5	0,1	0,0	0,0	0,0
Lánsbrøv	0,0	0,0	0,0	0,3	0,5	0,9	0,9	1,2	1,3
Danmark	0,0	0,0	0,5	3,2	3,8	4,7	5,3	5,6	5,6
Útlond annar	1,2	1,6	2,3	2,2	1,7	0,9	0,3	0,0	0,0
Tilsamans	1,7	2,1	3,5	6,2	6,5	6,7	6,5	6,8	6,9

Komununnna Skuld 30. 11. 95

Føroyar	1,2
Danmark	0,7
Útlond	0,0
	1,9

Íroknað í kommunuskrldina eru IRF og KOB, men ikki SEV

1. viðgerð 22. februar 1996. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 26. apríl 1996 legði fram soljóðandi

Á l l t

Málið var lagt fram av Fólkaflokkinum tann 13. februar 1996 og varð eftir 1. viðgerð tann 22. februar 1996 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meirluta og ein minnilutu.

Meirlutin (Vilhelm Johannesen, Kristian Magnussen, Álvur Zachariasen, Finnbogi Ísakson, Tordur Niclasen og Finnbogi Arge) tekur ikki undir við uppskotinum, og hava hesar viðmerkingar: " Ikki er gjørligt við tóg at gera uttanlandsskuldina upp. Tí neyðugt er við samráðingum hesum viðvikjandi. Talan er um føroyska uttanlandsskuldina, sum umfatar alt samfelagið, og ikki bert landskassans uttanlandaskuld.
Ikki er gjørligt at vita hvat virðið er á tí kapitaliseraða blokkstuðlinum, og ein uppgerð av fíggjar- og búskaparligu viðurskiftunum Føroya og Danmarkar ímillum eigur ikki bert at umfata blokkin, men onnur viðurskifti eisini. Tvs. at rætt er, at neyðugt er at gera viðurskifti Føroyar og Danmarkar ímillum upp, men hetta eigur at verða gjørt á einum breiðari grundarlagi, enn skotið er upp.

Í uppskotinum skal blokkurin brúkast til at gjalda uttanlandaskuldina við, sum fyri landskassans viðkomandi næstan bert er til danska statskassan. - men samtaert frásøgn frá samráðingunum millum landsstýrið og stjórnina í oktober 1993, boðaði stjórnin tá frá at uttanlandsskuldin skuldi gjaldast aftur av møguligum oljuinntøkum. Tí er spurningurin, um hetta uppskotið ikki er at taka ta ætlanina hjá stjórnini av.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg) tekur undir við uppskotinum. Vísast skal á, at hendu niðurstøðan/grundgevingin, sum meirlutin er komin við, er ein misskiljing av upskotinum, sum fyriliggur. Tí í uppskotinum stendur fyri tað fyrsta, at uttanlandsskuld landskassans verður mótroknað í tí kapitaliseraða virðinum av blokstuðulsveitingini, tað merkir, at vit fyrst og fremst skulu taka upp forhandlingar við dansku stjórnina, um at kapitalisera tað virðið, sum liggur í blokkinum. Tað verður ikki tikið støða til, um uttanlandaskuldin í dag er 7 mia., ella 7 mia. minus eina upphædd av eini eventuellari endurgjaldssak, viðv. bankaskuldini.

Uppskotið gongur út uppá at fáa tikið upp samráðingar við dansku stjórnina um at fáa gjørt upp í fíggjarligu viðurskiftunum Føroyar og Danmarkar ímillum.

Fólkaflokkurin er av tí metan, at tað er óforsvarligt einki at gera við hetta týdningarmikla mál. Tí tann búskaparliga støðan í Føroyum er, at fáa vit ikki eina uppgerð viðvikjandi okkara stóru uttanlandsskuld, so verður ikki møguligt í framtíðini at leggja til rættis ein skilagóðan fíggjarpolitik her á landi.

2. viðgerð 26. apríl 1996. Uppskotið fekk 7-5-14 atkvøður og fall.

40 Broytingar í rúsdrekkalógini

Ár 1996, mikudagin 7. februar legði Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broytingar í rúsdrekkalógini.

§ 1

Í Løgtingslóg nr. 20 frá 10. mars 1992 um innflutning og sølu av rúsdrekka verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 2, stk. 1 verður "2 1/4 vektprosent" broytt til: "2,8 rúmprosent".
2. .§ 2, stk. 2 verður orðað soleiðis:
   "Stk. 2. Sum rúsdrekka verður ikki roknað heilivágur, sum bert er loyvdur apotekum at selja eftir apotekaralóggávuni, hóast hesi hava í sær eitt alkoholrúmprosent, ið fer upp um 2,8."
3. Í § 3, stk. 1 verður nr. 2) orðað soleiðis:
   "2) at gera drekkandi tær í § 2, stk. 3 nevndu vørur."
4. Í § 3, stk. 2, verður "4,6 vektprosent" broytt til: "5,8 rúmprosent".
5. Í § 4 gongur stk. 3 út.
6. Í § 5 gongur stk. 3 út.
7. Í § 6 verður "4,6 vektprosent" broytt til: "5,8 rúmprosent".
8. § 8, stk. 1, verður orðað soleiðis:
   "Stk. 1. Rúsdrekkasøla Landsins kann heimilað føroysku bryggjaríunum at útflýggja egna framleiðslu teirra av øli, smbr. § 3, stk. 2."
9. Í § 10, stk. 3 verður skuytt uppí: "Loyvt er ikki persónum undir 18 ár at hava atgongd til støð, ið hava loyvi til útskeinking eftir hesum stk., ta tíð av degnum, skeinking er loyvd."
10. Í § 10, stk. 4 verða orðini "skip í sigling" broytt til: "skip í heimasigling".
11. Í § 12, stk. 3 verða sett sum nýggj pkt. 4 og 5: "Løgreglan kann góðkenna ein fyribilsleiðara í eitt avmarkað tíðarskeið, tó í mesta lagi 8 vikur tilsamans í einum ári. Leiðarin og fyribilsleiðarin hava somu revsirættarligu ábyrgd fyri rakstrinum av virkinum sum loyvishavarin."
12. Í § 14, stk. 1, pkt. 1 verður orðið "skal" broytt til: "kann".
13. Í § 15, stk. 3 verður orðið "møguliga" broytt til: "um neyðugt."
14. Í § 17, stk. 1 verður pkt. 1, orðað soleiðis: "Tað er forboðið, at selja ella flýggja út rúsdrekka til persónar, sum ikki eru fyltir 18 ár, ella at flýggja út rúsdrekka, um tað er samlíkt, at rúsdrekkað er tilætlað øðrum, sum ikki lúka treytirnar fyri at fáa rúsdrekka."
15. Í § 17, stk. 2 verða orðini "tryggja sær" broytt til: "tryggja sær við framvísan av samleikaprógvi".
16. Í § 25 verður "1995" broytt til: "1998."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 1. juli 1996.
Samstundis verður allur danski lógarteksturin avtikin.

Viðmerkingar:

Eftir § 25 í løgtingslóg nr. 20 frá 10. mars 1992 um innflutning og sølu av rúsdrekka er álagt landsstýrinum at leggja lógina fyri tingið til viðgerðar í 1995.

Eftir § 24 fekk landsstýrið heimild til at áseta, nær lógin skuldi koma í gildi í síni heild ella í pørtum. Hena var neyðugt, tí stórt fyrireikingararbeiði mátti gerast, áðrenn lógin kundi setast í gildi.
Við kunngerð nr. 59 frá 7. mai 1992 varð kapittul 4 í lógini um útskeinking sett í gildi og tey fyrstu skeinkiloyvini vórðu givin í juni 1992.

Givin eru tilsamans 34 skeinkiloyvir, harav 3 eru afturtikin.

Landsstýrið ásetir talið av skeinkiloyvum í hvørjun øki og er hægsta talið í løtuni ásett til:

Hotel og matstovur	Vertshús og ølklubbar

Suðurstreym	8	6
Norðurstreym	2	1
Vágar	1	1
Suðuroy	3	2
Eysturoy	5	4
Norðoyggjar	3	2
Sandoy	1	1
Serlig ferðaplass	3	

Við kunngerð nr. 141 frá 8. oktober 1992 fekk lógin gildi í sínt heild frá 2. november 1992 at rokna við undantak av § 10, stk. 2, nr. 3. Hesir partar av lógini viðvíktu serligu stovunnini av Rúsdrekkasølu Landsins, sum opnaði 2. november 1992. Seinni eru deildir settar á stovn í øllum sýslum.

§ 10, stk. 2, nr. 3 viðvíkur hølum til samkomur, ið sjálvi skipa fyri bordreiðing, og er her serliga hugsað um bygdahús og hús hjá fróttarfeløgum.

Eftir uppgerðum frá Rúsdrekka- og Narkotikaráðnum og Rúsdrekkasølu Landsins er nýtslan av rúsdrekka ikki munandi broytt í tey 3½ árini, nýggja rúsdrekkalógin hevur virkað, men samansetingin av tí rúsdrekka, ið nýtt verður, er nakað broytt, soleiðis at nýtslan av brennivíni er minkað, meðan nýtslan av øli er vaksin.

Landsstýrið hevur heitt á feløg, stovnar og onnur, sum hava havt við lógina at gera, um at senda landsstýrinum eina frágreiðing um, hvussu mett verður, at nýggja rúsdrekkaskipanin hevur virkað, og hvørjar broytingar eigi at verða gjørdar í galdandi lóg og kunngerðunum, sum givnar eru við heimild í lógini.

Landsstýrið tekur undir við fleiri av uppskotunum til broytingar í lógini og kunngerðunum.

Tey ummæli, ið landsstýrið hevur fingið í samband við endurskoðanina av lógini, verða send tinginum saman við hesum uppskoti.

Broytingaruppskotið verður ikki metti at hava fíggjarligan kostnað fyri landskassan ella størri arbeiðsbyrðu fyri fyrisitingina.

<u>Til tær einstøku broytingarnar hevur landsstýrið hesar viðmerkingar:</u>

<u>Ad.1.</u> Í lógini eru markini fyri styrkina í rúsdrekkanum ásett vektprosentum. Í tolllógini og á vøruni verður styrkin nú ásett í rúmprosenti, og verður tí skotið upp at nýta hetta í rúsdrekkalógini.

<u>Ad. 2.</u> Eftir § 2, stk. 2, nr. 1 verður denaturerað spritt ikki roknað sum rúsdrekka. Eftir stk. 3 í sama § fær landstýrið heimild til at áseta nærri reglur um alkohol til tekniska nýtslu v.m. Reglurnar samsvara sostatt ikki, og verður tí skotið upp at strika § 2, stk. 2, nr. 1.

<u>Ad 3.</u> Henda broyting er ein fylgja av teirri undir ad. 2 nevndu broyting.

<u>Ad. 4.</u> Víst verður til viðmerkingina ad. 1.

<u>Ad. 5.</u> Eftir § 4, stk. 3 kann landsstýrið eftir samráðing við Rúsdrekka- og Narkotikaráðið nýta ein part av yvirskotinum hjá Rúsdrekkasølu Landsins til fígging av upplýsandi virksemi og til viðger av rúsdrekkamisnýtarum. Henda regla samsvarar ikki við vanligu reglurnar um játtan av peningi úr landskassanum. Møguleikin at játta studning eftir hesi grein hevur heldur ikki verið nýttur, tí peningur er játtaður á serligum rekstrarstøðum á fíggarlógini til nevndu endamál.

<u>Ad. 6.</u> Skotið verður upp at strika § 5, stk. 3 um altarvín sum óneyðugu.

<u>Ad. 7.</u> Víst verður til ad. 1.

Ad. 8. Føroysku bryggjaríini fingu við lógarbroyting í 1980 loyvi til at bryggja øl við styrki upp til 4,6 vektprosent alkohol. Eisini fingu tey eftir nærri ásettum treytum loyvi til at selja teirra egnu framleiðslu.

Eftir § 8 í galdandi rúsdrekkalóg missa bryggjaríini loyvi til sjálvir at kunna selja teirra framleiðslu frá 1. januar 1997, og mugu tá selja teirra framleiðslu til Rúsdrekkasølu Landsins.

Bryggjaríini hava ført fram, at beinleiðis sølan hevur givið teimum so mikið av vinningi, at teir hava kunnað kappast við innflutningin av øli frá teimum stóru útlendsku bryggjaríunum. Missa teir henda handil, koma fleiri av depotunum kring landið í fíggjartrupulleikar og øll framleiðslan hjá føroysku bryggjaríunum bæði av øli og sodavatni í vanda fyri at steðga. Bryggjaríini hava umleið 50 fólk í arbeiði.

Ad. 9. § 10, stk. 3, viðvíkur feløgum, ið reka teir sokallaðu ølklubbarnar. Eftir broytingaruppskotinum verður ikki loyvi at lata persónar undir 18 ár fáa atgongd til støð, sum hava loyvi til skeinking eftir hesum stk., ta tíð av degnum, tá ið loyvt er at skeinkja, sjálvt um aldursmarkið fyri skeinking verður hildið. Á hotellum og restaurationum verður fremvegis galdandi vanliga reglan í § 17, stk. 1, um at ikki er loyvt at skeinkja fyri persónum undir 18 ár, men kunnu hesir fáa atgongd til restaurationina.

Ad. 10. Eftir § 7, stk. 2 kann rúsdrekka vera selt ferðafólki umborð á skipum í altjóða sigling. Í § 10, stk. 4 verður sagt, at skip í sigling skulu hava skeinkiloyvi.

Fyri at hava meira greiðar reglur verður skotið upp at broyta § 10, stk. 4 soleiðis, at henda regla bara kemur at galda fyri skip í heimasigling.

Ad. 11. Ein fyritøka við skeinkiloyvi skal leiðast av loyvishavaranum sjálvum, ella av einum góðkendum dagligum leiðara. Mælt verður til, at løgreglan kann góðkenna ein fyribils leiðara at hava dagligu ábyrgdina av skeinkiloyvinum, t.d. undir sjúku og frítið.

Ad. 12. Brýtur loyvishavarin lógina, kunngerðir við heimild í lógini ella treytir í loyvinum skal loyvisnevndin taka loyvið aftur, líka mikið um brotið kann sigast at vera álvarsligt ella ikki. Loyvishavarin hevur rætt til at krevja málið lagt fyru rættin, men hetta gevur ikki serliga meining, tí rætturin kann bara taka støðu til, um lógin er brotin ella ikki, men ikki meta um brotið er so álvarsligt, at loyvið eigur at vera tikið aftur. Skotið verður tí upp, at broyta orðið "skal" til "kann", soleiðis at eitt týdningarleyst broyt á reglurnar skal hava ta fylgju, at loyvið verður aftur tikið.

Ad. 13. Mælt verður til í § 15, stk. 3 at broyta orðið "møguliga" til "um neyðugt", soleiðis at loyvishavarin fær størri skyldu til at ansa eftir, at gestir, ið eru ávirkaðir av rúsdrekka, ikki sjálvir koyra hit heim.

Ad. 14. Eftir § 17, stk. 1, pkt. 1 er tað forboðið at selja ella flýggja út rúsdrekka til persónar undir 18 ár. Eftir uppskotinum verður hetta nú eisini forboðið, um tað er sannlíkt, at rúsdrekka verður keypt av millummanni fyri persónar undir 18 ár.

Ad. 15. Eftir uppskotinum til broyting av § 17, stk. 2 verður tað gjørt til eitt krav, at tann sum skeinkir ellar útflýggjar rúsdrekka, krevur framvísan av samleikaprógvi fyri at tryggja sær, at aldursmarkið verður hildið.

Ad. 16. Skotið verður upp, at lógin verður endurskoðað aftur um 3 ár.

Ad. § 2. Neyðugt er at seta eina hóskandi freist fyri, nær lógin skal koma í gildi, so neyðugar fyrireikingar kunnu gerast, fyri at lúka broyttu reglurnar.

Eftir nýggju stýrisskipanarlógini skulu løgtingslógirnar bara vera orðaðar á føroyskum, og ger hetta tað neyðugt í samband við lógarbroytinagar at avtaka allan danska lógartekstin, tí danski teksturin verður ikki broyttur, og samsvar verður aftaná lógarbroytingar ikki millum føroyska og danska tekstin.

1. viðgerð 14. februar 1996. Málið varð beint í trivnaðarnevndina, sum 19. mars 1996 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 7. februar 1996 og eftir 1. viðgerð 14. februar 1996 beint í trivnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið. Undir viðgerðini hevur prísurin á rúsdrekka verið umrøddur, og mett varð, at hann sum heild er ov høgur. Fyri at koma heimabrygging og øðrum rúsandi evnum til lívs, kundi umhugsast at sett prísirnir niður sum heild. Eisini kundi prísurin á teimum veikaru drykkunum (upp til uml. 22 %) verið lægri enn prísurin á teimum sterku drykkunum.

Ein avleiðing av at seta prísirnir niður er, at um hetta verður gjørt við at seta punktgjøldini á rúsdrekka niður, missir landskassin inntøku. Um ein prislækking førir við sær, at heimabrygging minkar, vigar hetta upp ímóti inntøkumissinum bjá landskassanum.

Broytingin í § 10, stk. 3 sigur, at tað ikki er loyvt persónum undir 18 ár at hava atgongd til støð, ið hava loyvi til útskeinking ta tíð á degnum, skeinking er loyvd. Nevndin førir fram, at hendan reglan bert er galdandi tá talan er um feløg, ið reka vinnuligt virksemi og feløg, ið skeinkja rúsdrekka fyri limum móti gjaldi, sambært galdandi § 10, stk. 3, men at gistingarhús og matstovur ikki eru umfatað av hesi reglu.

Nevndin beldur ikki grundarlag vera fyri at áseta vikutal fyri tað avmarkaða tíðarskeiðið, sum løgreglan skal góðkenna fyribilsloyvi fyri sambært § 12, stk. 3.

Um broytingina í § 14, stk. 1, 1. pkt. førir nevndin fram, at broytingin ikki má bera við sær, at skeinkiloyvið ikki verður tikið, um brot er framt.

Í § 17, stk. 2 í uppskoti landsstýrisins verður orðingin "tryggja sær" broytt til "tryggja sær við frumvísan av samleikaprógvi". Nevndin metir, at hendan orðingin krevur, at starvsfólkini á Rúsdrekkasøluni eisini skulu biðja um samleikaprógv frá einum eldri persóni, sum uttan iva eru yvir 18 ár. Orðingin er óheppin, og skjýtur nevndin tí upp, at "tryggja sær" heldur verður broytt til "um neyðugt tryggja sær við frumvísan av samleikaprógvi".

Ein samd nevnd setir tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t
til

uppskot landsstýrisins

Í § 1 í uppskoti landsstýrisins verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 5, stk. 3 verður ikki strikað
2) Í § 12, stk. 3 verða pkt. 4 og 5 orðað soleiðis:
"Løgreglan kann góðkenna ein fyribilsleiðara í eitt avmarkað tíðarskeið. Leiðarin og fyribilsleiðarin hava sonu revsirættarligu ábyrgd fyri rakstrinum av virkinum sum loyvishavarin."
3) Í § 17, stk. 2 verða orðini "tryggja sær" broytt til "um neyðugt tryggja sær við framvísan av samleikaprógvi".

Í § 2 í uppskoti landsstýrisins verður gjørd hendan broyting:
4) 2. pkt. verður orðað soleiðis:
" Samstundis fer danski lógarteksturin í løgtingslóg nr. 20 frá 10. mars 1992 um innflutning og sølu av rúsdrekka úr gildi."

Undir viðgerðini hevur nevndin annars býtt seg í ein meirihluta og ein minniluta.

Meirilutin (Kristian Magnussen, Lisbeth L. Petersen, Maria Hansen, Vilhelm Johannesen, Óli Breckmann og Jørgen Niclasen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir tinginum til at samtykkja tað við omanfyrinevndu broytingum.

Minnilutin (Jákup Olsen) førir fram, at løgtingsmál nr. 40/1995 er eitt grovt brot á galdandi rúsdrekkalóg § 25, sum sigur, at Føroya Landsstýri skal leggja løgtingslógina fyri tingið at viðgera í 1995. Hetta er ikki gjørt.

Mælt verður tí til, at Føroya Landsstýri tekur uppskotið aftur og ber so í bandi, at skipað verður fyri einum aðalorðanskifti og viðgerð av galdandi rúsdrekkalóg á Føroya Løgtingi. Í verandi uppskoti kann minnilutin (Jákup Olsen) ikki taka undir við broytingaruppskotum í §§ 10, 14 og 25.

Minnilutin setir tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

1) § 10, stk. 4 verður orðað soleiðis:
"Reglurnar í stk. 1 um loyvi eru eisini galdandi fyri ferðamannaskip í uttanlandssigling."

2) § 14, stk. 1, 1. pkt. verður orðað soleiðis:
"Hevur loyvishavarin brottið reglurnar í hesi løgtingslóg, reglur ásettar við heimild í hesi lóg ella treytirnar í loyvinum, skal loyvisnevndin taka loyvið aftur."

3) § 25 verður orðað soleiðis:
"Landsstýrið skal leggja løgtingslógina um innflutning og sølu av rúsdrekka fyri tingið at viðgera í 1996."

2. viðgerð 27. mars 1996. Broytingaruppskot 1, 2 og 3 frá minnilutanum Jákup Olsen fullu við ávikavist 2-7-16, 9-2-14 og 11-2-12 atkvøðum. Broytingaruppskot frá samdari nevnd til § 1 í uppskoti landsstýrisins samtykt við 21-3-1 atkvøðum. Broytingaruppskot frá samdari nevnd til § 2 í uppskoti landsstýrisins samtykt við 21-5-0 atkvøðum. Samtykt við 20-5-1 atkvøðum at beina málið soleiðis broytt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 14. mai 1996. Málið endaliga samtykt við 21-6-0 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 93, 4. juni 1996.

F.L. j.nr. 600-5/91.

41 Frágreiðing um Tingmannaráð Útnorðurs

Ár 1996, friggjadagin 2. februar legði Lisbeth L. Petersen vegna Tingmannaráð Útnorðurs fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna hjáløgdu frágreiðing.

Frágreiðingin er til skjals á løgtingsskrivstovuni.

1. viðgerð 22. februar 1996. Málið varð beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.
2. viðgerð 12. mars 1996. Málið endaliga samtykt við 21-0-0 atkvøðum.

42 Broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap

Ár 1996, týsdagin 13. februar legði Ivan Johannesen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 5, stk. 4 verður orðað soleiðis:

"Stk. 4. **Fiskiloyvi** sambært hesi lóg er tann rettur, sum Føroya Landsstýri hevur latið eigara av ávísum fiskifari, sum hevur veiðuloyvið sambært stk. 3, at veiða ávísa nøgd úr fiskastovnum á ávísum leiðum í ávísum fiskiári. Fiskiloyvi kann eisini verða latið eigara av fiskifari, sum uttan at hava fingið veiðiloyvi sambært stk. 3, fær lyribils ella avmarkaði rettindir at veiða ávísa nøgd úr fiskastovnum á ávísum leiðum í ávísum fiskiári."

2) Í § 6 verður orðingin "veiðuloyvi" strikað.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar:

Landsstýrið legði uppskot til broytingar í lógini um vinnuligan fiskiskap fyri løgtingið í desember 1995, løgtingsmál nr. 20/1995.

Málið varð eftir viðgerð í vinnunevndini samtykt 22. desember 1995, uttan at uppskotið hjá landsstýrinum um veiði- og fiskiloyvi vóru tiknar við.

Eftir stendur, at landsstýrið ikki hevur heimild til at gagnnýta ónýttar kvotur við at lata eitt fiskiloyvi í einum fiskiári, uttan at hetta gevur varandi veiðirettindir og fyri at avreiða krevst bæði veiði- og fiskiloyvi. Samsvarandi § 11 krevst veiði- og fiskiloyvi til tess at reka vinnuligan fiskiskap á landleiðunum og á fjarleiðum.

Í § 5 í lógini er ein allýsing av veiðiloyvi og fiskiloyvi. Eftir stk. 3 er veiðiloyvi sambært hesi lóg góðkenning, ið Føroya Landsstýri veitir ávísum fiskifari at veiða á føroysku landleiðunum og á leiðum uttanfyri føroysku landleiðirnar. Í stk. 4 verður sagt, at fiskiloyvi sambært hesi lóg er tann rettur, sum Føroya Landsstýri hevur latið eigara av ávísum fiskifari, sum hevur veiðiloyvi sambært stk. 3, at veiða ávísa nøgd úr fiskastovnum á ávísum leiðum í ávísum fiskiári.

Sambært § 1 í kunngerð nr. 54 frá 26. mars 1993 um veiðuloyvi til føroysk fiskiskip, sum framvegis er í gildi, jvb. § 48, stk. 2 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, eru veiðiloyvini býtt upp í tveir høvuðspartar: Veiði á føroysku landleiðunum og veiði uttan fyri føroysku landleiðirnar. Hvør partur er síðani býttur upp í ymisk sjóøki, veiðibattir v.m.

Eitt veiðiloyvi kann eisini bert umfata altjóða sjógv. Í § 2 í kunngerðini verður ásett, at umfatt veiðiloyvi krevst serligt fiskiloyvi.

Høvuðsreglan er tí, at einki skip kann fara til fiskiskap uttan at hava veiðiloyvi og fiskiloyvi, og sum tað eisini beinleiðis verður sagt í § 11, stk. 1 og 2 í lógini um vinnuligan fiskiskap. Í § 11, stk. 3 verður sagt, at fiskiskapur við fiskiførum undir føroyskum flaggi uttanfyri føroysku landleiðirnar á havleiðum nevndar í §

4. stk. 4 kann bert fara fram við loyvi frá Føroya Landsstýri, og kann landsstýrið í loyvinum áseta nærri treytir fiskiskapinum viðvíkjandi. Við tað, at stk. 3 bert nýtir orðingina "loyvi", hevur ivi verið um hetta "loyvi" er nakað, sum er ætlað til at geva landsstýrinum serligar heimildir, ið ikki eru tengdar at verandi skipan við veiði- og fiskiloyvi, t.d. at geva ávísum fiskifari ónýttar kvotur móti endanum av árinum, sum fiskifarið annars ikki hevði rætt til.

Tess vegna legði landsstýrið uppskot til broyting av besi grein, sum við hesum nú verður lagt fram aftur.

Landsstýrið miðjar eisini fimóti, at skipanin við veiði- og fiskiloyvum verður endurskoðað.

1. viðgerð 16. februar 1996. Málið varð beint í vinnunevndina, sum 24. apríl 1996 legði fram soljóðandi

Á 11 t

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 13. februar 1996 og eftir 1. viðgerð tann 16. februar 1996 beint í vinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og hevur undir viðgerðini havt fund við umboð fyri felagið rækjuskip.

Skotið verður upp at gera broytingar í grein 5, stk. 4 og í grein 6 í lógini um vinnuligan fiskiskap. Tann 25. mars 1996 legði landsstýrið fram tingmál nr. 96/1995: Broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, sum eftir 1. viðgerð varð beint í vinnunevndina. Í hesum málinum er nýggj orðing til alla grein 5, og er nevndin samd um at viðgerða alla grein 5 í tingmáli nr. 96/1995.

Í broytingini til grein 6 mælir landsstýrið til at orðingin "veiðuloyvi" verður strika. Orðingin í uppskoti landsstýrisins er nakað ógreið og setir nevndin tí fram broytingaruppskot hesum viðvíkjandi.

Við hesum broytingum mælir **ein samd nevnd** løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins og setir samsvarandi hesum fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

1) § 1, nr. 1 verður strikað.

2) § 1, nr. 2 verður soljóðandi:
"Í § 6 verða orðini "veiðu- og" og "veiðu- ella" strikað."

2. viðgerð 29. apríl 1996. Broytingaruppskot frá sundari vinnunevnd samtykt við 24-0-0 atkvøðum. Samtykt við 25-0-0 atkvøðum at beina málið soleiðis broytt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 8. mai 1996. Málið endaliga samtykt við 23-0-0 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 42, 20. mai 1996.

F.L. j.nr. 1501-1/91.

43 Løgtingslóg um viðbót til ávísar pensionistar v.fl.

Ár 1996, týsdagin 13. februar legði Andrias Petersen, landsstýrismaður fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um viðbót til ávísar pensionistar v.fl.

§ 1. Í fíggjarárinum 1996 verður úr landskassanum veitt ein viðbót til pensionistar við kr. 3.150,- til hvønn pensionist. Giftir pensionistar eiga eina viðbót í felag.

§ 2. Viðbótin verður lutað í 3 partar á kr. 1.050,-, sum verða at útgjalda 1. mars, 1. juli og 1. desember 1996.

§ 3. Viðbótin verður latin fólki, sum áðrenn ávikavíst 1. mars, 1. juli og 1. desember hava fingið játtað fólkapensión, avlarnispensión ella einkjupensión ella hava latið inn umsókn um slíka pensión, tí rætturin til hana er fingin, og seinni fáa pensión játtaða.

§ 4. Treytin fyri at fáa viðbótina er, at pensionisturin ikki hevur hægri ársinntøku umfrumt pensiónina enn kr. 80.000,- fyri hjón og kr. 60.000,- fyri støk.

Til grund fyri veitan av viðbótini verður lagd inntøkan, sum liggur til grund fyri pensiónsútrokningini útgjaldingardagin.

§ 5. Í fíggjarárinum 1996 verður viðbótin sambæn §§ 1 og 2 eisini veitt fólki, sum fáa stuðul sambæt § 13 í forsorgarlúgini, undir sama treytum sum fyrisett í § 4.

§ 6. Almannastovan hevur fyrisitingina av viðbótini um hendi.
Stk. 2. Avgerðir, sum Almannastovan hevur tikið, kunnu innan 4 vikur kærast til Kærunevndina í almannamálum.

§ 7. Viðbótin er ikki skattskyldug.

§ 8. Hendan lóg fer gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar:

Viðbót til ávísar pensionistar varð fyrsta ferð veitt í fjør við løgtingslóg nr. 158 frá 6. desember 1995. Viðbótin er ætlað sum eitt alment ískoyti til pensiónina til teir pensionistar, sum eru fíggjarliga ringast fyri.

Stuðulin varð frá 1980 til 1987 nevndur brennistuðningur og ætlaður sum ískoyti til oljugjald. Frá 1988 til 1994 varð heitið broytt til brenni- og samskiftisstuðul, ætlaður sum ískoyti til olju-, sjónvarps- og útvarpsgjald.

Tá upphæddin í ár er munandi hækkað í mun til árini frammanundan, skal viðbótin partvís síggjast sum endurbót til teir pensionistar, sum orsakað av lágu pensiónsinntøkuni, og harvið avmarkaða skattinum, ikki fáa tann fíggjarliga fyrimun av broytingunum í skattastigantum, sum aðrir inntøkubólkar fáa í 1996 við broytingunum í skattalógini.

Samlaða útreiðslan í 1996 verður 11,5 mió kr. Verandi játtan á løgtingsfíggjarlógini eigur sostatt at verða hækkað við 3,5 mió kr.

Útrokningargrundarlagið fyri viðbótina í 1996 er 3.650 pensionistar.

Viðbótin verður, við støði í eini játtan uppá 11,5 mió. kr. og 3.650 pensionistum, kr. 3.150,- til hvønn pensionistin, sum lýkur treytirnar. Og verður hon útgoldin í trimum til tann 1. mars, 1. juli og 1. desember við kr. 1.050,- hvørja ferð.

Talva 1: Yvirlit yvir studningsupphædd pr. pensionist 1980/81-95

80/81	81/87	88/89	90/91	1992	1993	1994	1995
900	200	2.200	1.943	1.928	1.569	1.850	1.805

Talva 2: Yvirlit yvir tal av studningsmóttakarum 1989-95

1989	1990	1991	1992	1993	1994	1995
3.270	3.294	3.370	3.454	3.554	3.566	3.572*

*Endaliga talið kann blíva nakað hægri, sí § 3 í lógini viðv. teim, sum hava søkt pensión, men enn ikki hava fingið játtan.

1. viðgerð 16. februar 1996. Málið verð beint í trivnaðarnevndina, sum 22. februar 1996 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 13. februar 1996, og eftir 1. viðgerð tann 16. februar 1996 beint í trivnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og er undir viðgerðini vorðin varug við, at broytingaruppskotið frá fíggjarnevndini um at hækka rakstrarstað 19678 "Viðbót til ávísar pensionistar" við kr. 3,5 mió., er gloppið burtur ímillum undir viðgerðini av fíggjarlógini fyri fíggjarárið 1996. Verandi játtan á løgtingsfíggjarlógini eigur sostatt at verða hækkað við 3,5 mió. kr.

Nevndin vísir á, at hetta er 16. árið, at lógaruppskot um viðbót til ávísar pensionistar v.fl. verður lagt fyri tingið. Út frá hesum heldur nevndin, at landsstýrið skuldi umhugsað at gjørt eina lóg, ið ikki skal samtykkjast á hvørjum ári, og áti viðbótin harvið at verið ásett í kunngerð.

Viðvíkjandi § 4 metir nevndin, at hendan er ógreitt orðað, og kann misskiljast.

Ein samd nevnd setir tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til § 4 í uppskoti landsstýrisins:

1) § 4 verður orðað soleiðis:

"Treytin fyri at fáa viðbótina er, at stakur pensionistur ikki hevur hægri ársinntøku umfram pensiónina enn kr. 60.000, og at giftur pensionistur, sammen við hjúnafelaga, ikki hevur hægri ársinntøku umfram pensiónina enn kr. 80.000. Til grund fyri veitan av viðbótini verður lagd inntøkan, sum liggur til grund fyri pensiónsútrokningini útgjaldingardagin."

2. viðgerð 7. mars 1996. Broytingaruppskotið frá trivnaðarnevndin varð samtykt við 22-0-0 atkvøðum. Samtykt við 25-0-0 atkvøðum at beina málið soleiðis broytt til 3. viðgerð.

12. mars legði trivnaðarnevndin fram soljóðandi

Broytingaruppskot

til

3. viðgerð

[§ 3 í uppskoti landsstýrisins verður "1. mars" broytt til: "1. apríl".

Broytingin stendst av, at útgjalding ikki kann fremjast 1. mars 1996 orsakað av, at farið er um 1. mars.

3. viðgerð 12. mars 1996. Broytingaruppskotið frá trivnaðarnevndini til § 3 samtykt við 20-0-1. Lógin soleiðis broytt endaliga samtykt við 21-0-0 atkvøðun.

F.L. j.nr. 1010-4/91.

Løgtingslóg nr. 28 frá 26. mars 1996.

44 Løgtingslóg um ábyrgd fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v.m. á goymslu

Ár 1996, týsdagin 13. februar legði Ivan Johannesen, landsstýrismaður fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um ábyrgd fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v.m. á goymslu.

§ 1. Landsstýrinum er heimilað landskassans vegna í fíggjarárinum 1996 at borga sum einfaldur borgsmaður fyri lánum til fiskamjøl, lýsi, matsild, makrel og fiskafóður á goymslu. Borgan verður givin fyri lánum, ið ikki mugu fara upp um 70% av lánsvirðinum.

§ 2. Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar:

Uppskotið er samsvarandi løgtingslóg nr. 102 frá 20. juni 1995, sum fór úr gildi 31. desember 1995, sí løgtingsmál nr. 183/1994, og er bert ein endurnýgging av lógini. Tó er harumfram tikið við, at lógin eisini skal fevna um føroyskt framleitt fiskafóður.

Danska fíggjarmálaráðið hevur í desember 1993 góðtikið heimildina til borgan sambæt hesi lóg, hóast avtaluna frá 28. mai 1993, pkt. 4, og mett verður, at henda góðkenning eisini er galdandi fyri 1996.

Í fíggjarárinum 1995 eru borganir veittar fyri 20 mió. kr. til fiskamjøl og lýsi á goymslu.

Mett verður, at borganir í fíggjarárinum 1996 verða áleið tær somu sum fyri 1995.

Víst verður annars til løgtingsmál nr. 44 frá 7. mai 1963, har fyrsta lógin um goymslulán kom í gildi.

1. viðgerð 16. februar 1996. Málið verð beint í vinnunevndina, sum 7. mars 1996 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 13. februar 1996 og eftir 1. viðgerð tann 16. februar 1996 beint í vinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið. Undir viðgerðini hevur nevndin hildið fund við umboð fyri nevndina í Havsbrún, og metti hesin, at fyriliggjandi uppskot var av so stórum týdningi fyri slíka framleiðslu og nýggjar framleiðslur av fiskaslógum her er talan um.

Út frá omanfyristandandi tekur **ein samd nevnd** undir við uppskoti landsstýrisins og mælir løgtinginum til at **samtykkja** tað.

2. viðgerð 12. mars 1996. Samtykt at beina málið til 3. viðgerð við 24-0-0 atkvøðum.

3. viðgerð 19. mars 1996. Uppskotið endaliga samtykt við 24-0-0 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 27 frá 26. mars 1996.

F.L. j.nr. 1400-7/91.

45 Løgtingslóg um sjónvarp

Ikki framlagt.

46 Løgtingslóg um stuðul til ídnaðartrolarar

Ár 1996, týsdagin 12. mars legði Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður, vegna Ivan Johannesen, landsstýrismann, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um stuðul til ídnaðartrolarar.

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað, av árligu játtanini á løgtingsfíggjarlógini, at veita stuðul í tvey ár, til eigarar av ídnaðartrolarum við veiðiloyvi.

§ 2. Talið av veiðiloyvum eru 8 og stuðulin til hvørt veiðiloyvi er kr. 300.000 um árið. Stuðulin verður útgoldin í eins stórum mánaðargjøldum.

§ 3. Stuðulin kann eftir umsókn verða útgoldin í einum, um veiðiloyvið verður latið landsstýrinum endaliga, ella um fiskifarið verður býtt um við annað fiskifar við sama veiði.
Stk. 2. Stuðulin og veiðiloyvið eftir hesi lóg kann eftir umsókn við loyvi frá landsstýrinum flytast yvir á annað fiskifar upp á upprunaligu treytirnar, um eitt veiðiloyvi verður latið endaliga inn.

§ 4. Undantikið í teimum førum, sum nevnd eru í § 3, stk. 1, steðgar útgjaldingin av stuðlinum, tá fiskifar skiftir eigara ella ikki er í vinnu.
Stk. 2. Tá ið eigaraskifti fer fram, verður eftir umsókn til landsstýrið tað, sum eftir er av stuðlinum, goldið nýggja eigaranum.

§ 5. Landsstýrið kann í kunngerð áseta nærri reglur og krøv um skjalprógvan, sum eru neyðug til at útinna hesa lóg.

§ 6. Hendan lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar:

Á Løgtingsfíggjarlógini fyri 1996 eru játtaðar 2,4 mill. kr. til stuðul til ídnaðartrolarar. Uppskotið er gjørt fyri at skapa lógargrundarlag fyri útgjalding av stuðli av hesi játtan. Leisturin sum uppskotið er gjørt eftir, er lógin um fløgustuðul til fiskiskaflotan.

Talan er um 8 ídnaðarskip. Samlaði kostnaðurin av hesi skipan, sum verður galdandi í tvey ár, verður í mesta lagi 4,8 mill. kr.

Mælt verður til, at stuðulin verður útgoldin eftir somu reglum, sum eru ásettar í kunngerðini fyri fiskiskaflotan yvir 20 brt.

1. viðgerð 19. mars 1996. Málið varð beint í vinumnevndina, sum 29. mars 1996 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 12. mars 1996 og eftir 1. viðgerð tann 19. mars 1996 beint í vinumnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið. Nevndin uppfatar stuðulin sum eitt endurgjald til ídnaðartrolarar, fyri at teir hava fingið avmarkað síni veiðurættindi við Føroyar, og tískil hava figið eitt veikari inntokugrundarlag. Eisini má staðfestast, at landsstýrið hevur hildi tað verið neyðugt at varðveita hendan flotan, fyri at kunna gera brúk av kvotunum í norðsjónum.

Meirilutin (Henrik Old, Jákup Joensen, Óli Jacobsen og John Petersen) tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Heini O. Heinesen, Álvur Zachariasen og Jákup Olsen) setir fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

Í § 1 í uppskoti landsstýrisins verður skoytt uppí: "sum ikki veiða á føroysku landleiðini". Við hesi broyting tekur minnilutin undir við uppskoti landsstýrisins, og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 11. apríl 1996. Broytingarupppskot minnilutans fekk 6-2-16 atkvøður og fall. Samtykt við 20-3-1 atkvøðum at beina uppskot landsstýrisins til 3. viðgerð.

3. viðgerð 19. apríl 1996. Uppskotið endaliga samtykt við 15-7-0 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 48 frá 30. apríl 1996.

F.L. j.nr. 1500-23/96.

47 Broyting í løgtingslóg um sjónvarp

Ikki framlagt

48 Løgtingslóg um sjónvarp

Ár 1996, hósdagin 7. mars legði Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um sjónvarp.

§ 1. Landið hevur gjøgnum Sjónvarp Føroya einkarrætt til at senda sjónvarp í Føroyum, jbr. tó §§ 9 og 10.
Stk. 2. Landsstýrið hevur ábyrgdina av sjónvarpssendinetinum, og landskassin ber allan kostnaðin av hesum. Telefonverk Føroya Løgtings umsitur sjónvarpssendinetið.

§ 2. Sjónvarp Føroya kann gera og senda sjónvarpssendingar í Føroyum, men kann eisini reka annað virksemi, sum náttúrliga er knýtt at uppgávum stovnsins.
Stk. 2. Sjónvarp Føroya skal luttaka í landsumfatandi tilbúgvingarætlanum.
Stk. 3. Landsstýrið kann loyva Sjónvarpi Føroya at skipa fyri inntøkugevandi tiltøkum, heruppií eydnuspølum og at senda lýsingar. Inntøkur hjá Sjónvarpi Føroya kunnu einans nýtast til sjónvarpsendamál.
Stk. 4. Gjøldini fyri lýsingar sambært stk. 3 skulu góðkennast av landsstýrinum.

§ 3. Programmvirksemið hjá Sjónvarpi Føroya skal fevna um tíðindaflutning, upplýsing, undirhald og mentan. Í programvirkseminum skal dentur verða lagdur á eitt sakligt og óheft upplýsingarvirksemi, talufrælsi og eitt fjøháttað programmtilboð.
Stk. 2. Landsstýrið velur eina nevnd við 5 limum, sum ráðgevur Sjónvarpi Føroya viðvíkjandi programmvirksemi stovnsins. Landsstýrið kann eftir tilráðing frá lurtarafeløgum, sum framnanundan

hava fingið góðkent tilráðingarheimild frá landsstýrinum, nøra um nevndina við einum tíni. Limirnir fáa samsýning og ferðaútreiðslur goldnar eftir reglum landsstýrisins um fundarpening og ferðapening.
Stk. 3. Nevndin ger sjálv starvsskipan sína, sum skal góðkennast av landsstýrinum.

§ 4. Landsstýrið setir stjóran á Sjónvarpi Føroya, sum eftir nærri reglum, ið landsstýrið ásetir, hevur leiðsluna av stovninum. Stjórin á Sjónvarpi Føroya setir starvsfólk annars á stovninum.
Stk. 2. Nevndin eftir § 3, stk. 2, verður vald fyri 4 ár, tó so at nevndarlimur verður sitandi, til nýggjur limur er valdur. Samstundis verða vald persónlig varafólk. Landsstýrið tilnevnir formannin í nevndini.

§ 5. Ársroknskapurin hjá Sjónvarpi Føroya skal grannskoðast av løggildum grannskoðara, og góðkennast eftir reglunum fyri almennar roknskapir. Roknskaparárið fylgir almanakkaárinum.
Stk. 2. Sjónvarpi Føroya er heimilað við landsstyrisins loyvi, í hvørjum einstøkum føri innan karmarnar av góðkendari fíggjarætlan stovnsins at taka upp neyðugt lán, sum tó í mesta lagi er 25% av inntøkunum av sjónvarpsgjaldinum árið frammanundan, til at tryggja stovninum gjaldføri.

§ 6. Hvørt búski, stovnur, virki, handil, skip v.m., sum hevur sjónvarpstól, skal rinda sjónvarpsgjald til Sjónvarp Føroya. Landsstýrið ger nærri reglur um, hvørji tól koma undir gjaldsskyldu, og nær gjaldsskyldan heldur uppat.

§ 7. Landsstýrið ásetur, eftir ummæli frá Sjónvarpi Føroya, sjónvarpsgjaldið fyri 1 ella fleiri ár í senn.
Stk. 2. Landsstýrið ásetur nærri reglur um avgreiðslugjald, eykagjald fyri ov seint goldið sjónvarpsgjald og um innheintingargjald.
Stk. 3. Gjøldini, ið nevnd eru í stk. 1 og 2, kunnu krevjast inn við panting.

§ 8. Øll, sum útvega sær sjónvarpstól, skulu heinavegin boða Sjónvarpi Føroya frá. Tey, sum selja, leiga út ella lata frá sær sjónvarpstól, skulu skrivliga boða Sjónvarpi Føroya frá innan 10 dagar.
Stk. 2. Landsstýrið ásetir nærri reglur um fráboðanarskyldunna.

§ 9. Landsstýrið kann geva einstøkum kommunum, ella í mesta lagi 3 grannakommunum í felag, loyvi til at senda sjónvarpssendingar loftvegis ella gjøgnum kaðal samtbert reglum ásettum av landsstýrinum. Hesi loyvi kunnu tó ikki fevna um sjónvarpssendinetið hjá landinum. Loyvini kunnu bert galda fyri avmarkaði geografisk øki og skulu vera tíðaravmarkað til í mesta lagi 5 ár.
Stk. 2. Loyvi sambæri stk. 1 kunnu bert fevna um at taka niður og senda óbroyttar og óavmarkaðar avísar útlendskar sjónvarpsrásir, sum ikki burturav eru ætlaðar føroyskum móttakarum.

§ 10. Kommunur kunnu eftir ummæli frá Telefonverki Føroya Løgtings geva grannløgum við í mesta lagi 25 húskjum loyvi at taka niður sjónvarpsrásir á felags antennuútbúnaði, og gjøgnum kaðal breiða tær út til hvørt einstakt búski eftir reglum sum landsstýrið ásetur.
Stk. 2. Landsstýrið kann, um serligar umstøður taka fyri tí, geva serligt loyvi, til at lata fleiri enn 25 búski vera saman um felags antennuútbúnað.
Stk. 3. Allar útbreiðslur við hjálp av felags antennum við tilknýti til fleiri enn 4 búski, skulu umfata sendingarnar hjá Sjónvarpi Føroya.

§ 11. Loyvishavarin sambæri § 9 ella § 10 skal eftir áheitan frá landsstýrinum, ávíkavist avvarðandi kommunu, skjalprógva skrivliga heimild til hetta virksemi frá viðkomandi sjónvarpsrás.
Stk. 2. Loyvishavarin hevur ábyrgdina av, at ásetingarnar í loyvinum verða hildnar.
Stk. 3. Verða ásetingarnar í loyvinum ikki hildnar, ella hevur loyvið verið ónýtt í eitt ár, kann loyvið takast aftur.

§ 12. Ongum er heimilað at leggja nýggjar leiðningar, so teir nerva leiðningar sjónvarpsins ella tól, sum standa í samband við teir.
Stk. 2. Hevur persónur ella kommuna elleiðningar ella tól, sum skapa trupulleikar fyri nýtslu sjónvarpsins, er Sjónvarpi Føroya heimilað fyri rokning eigarans at gera tørvandi fyriskipanir at byrgja fyri tílíkum.
Stk. 3. Tað er loyvt eftirliti Sjónvarpi Føroya í eftirlitsørindum at fara um annan mans grund og inn í hús, men má tá sigast frá frammanundan.
Stk. 4. Kunngerð viðvíkjandi útvarpsólíkóði verður eisini at galda fyri sjónvarpið. Sonnleiðis verður eftirlit útvarpsins eisini at umfata sjónvarpið.

§ 13. Í kirkjur, sjónleikarhús, samkomuhús, skólar, veitingarhús og rúm, sum annars verða nýtt til almennar skemtanar ella fundir, skal Sjónvarpi Føroya verða heimilað uttan end urgjald at leggja tørvandi leiðningar fsjónvarpsendanáli.
Stk. 2. Heimilað er Sjónvarpi Føroya at upptaka og varpa út uttan endurgjald frá almennum fundum og tiltøkum. Sjónvarp Føroya skal tó frammanundan boða teimum frá, ið skipa fyri.

§ 14. Brot móti hesi lóg koma undir sekt. Málini

vera framd sum løgreglumál, tó so at reglurnar í rættargangslógini deild 68 og 69 vera tilsvarandi nýttar sum í málum statsadvokaturin fremur.
Stk. 2. Landsstýrinum verður heimilað at royna at fremja mál um brot móti lógarinnar § 7 sum fyrisitingarmál.
§ 15. Henda lóg kemur í gildi 24. mars 1996. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 77 frá 21. mai 1982 um sjónvarp, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 172 frá 22. desember 1995.
Stk. 2. Kunngerð nr. 176 frá 27. desember 1995 um sjónvarpsgjald verður gladandi, til hon er lýst at fara úr gildi.

Viðmerkingar:

Galdandi sjónvarpslóg er frá 1982. Sjónvarpsmiðlar eru allastaðni fyri stórum broytingum, og føroyska lógin er ikki longur tíðarhóskandi.

Í 1990 setti landsstýrið eina nevnd at gera álit um útvarp, sjónvarp og aðrar fjølmiðlaspurningar. Nevndin legði fram álit á sumri 1991. Seinni ummæltu Útvarpið, Sjónvarpið, útvarpsnevndin og sjónvarpsnevndin álitið. Tilfarið hevur verið við í viðgerðini, nú landsstýrið hevur tikið stig til at endurskoða lóggávuna.

Landsstýrið heldur, at alt sjónvarpsvirksemið, ætlað føroyskum umráði burturav, eigur at verða rikið innan karmarnar hjá Sjónvarpi Føroya. Við avmarkaða fólkagrundarlagnum og fíggjarorkuni í Føroyum í huga heldur landsstýrið tað hava stóran týdning, at vit hava eitt sjónvarp, sum er ført fyri eftir forimuni at røkja sínar samfelagsligu og mentanarligu uppgávur. Allar tær rásir, sum í framtíðini fara at senda síni signal inn yvir Føroyar, hava fíggjarætlanir, sum eru nógvar ferðir størri enn tann hjá Sjónvarpi Føroya. Tað hevur tí stóran týdning ikki at spjaða tað sindrið av kreftum, vit eiga í landinum.

Hóast Sjónvarp Føroya røkir somu skyldur sum eitt landssjónvarp, er tað í bæði formi og innihaldi í stóran mun átøkt økissjónvørpum aðrastaðni. Harafturat skilir landsstýrið, at leiðslan í Sjónvarpi Føroya er farin undir samráðingar við privatar framleiðarar um at lata SvF føroyskt tilfar.

Landsstýrið heldur somuleiðis, at Útvarpið og Sjónvarpið framhaldandi eiga at verða rikin sum tveir sjálvstøðugir stovnar. Loftmiðlarnir hava í dag samstarv á fleiri økjum, bæði hvat framleiðslu og fyrisitingarligum málum viðvíkur. Men royndir vísa, at samstarvsmøguleikarnir eru avmarkaðir, av tí at miðlarnir eru sera ymiskir og seta ymisk krøv. Skipanin við tveimum sjálvstøðugum stovnum hevur eisini við sær, at einkarrætturin á elektroniska fjølmiðlaøkinum í veruleikanum er brotin.

Sjónvarp Føroya fíggjar sjálvt rakstur sín. Í fyriliggjandi uppskoti verður inntøkugrundarlagið byggjaragjøld, lýsingar, spøl og onnur inntøkugevandi tiltøk. Landsstýrið skal góðkenna tiltøkini. Sjónvarp Føroya hevur eins og aðrar fyritøkur og stovnar merkt sviðan av afturgongdini í samfelagnum, og hetta er óheppið, nú stovnurin hevur fyri neyðini at brynja seg til stór umskifti á sjónvarpsøkinum, og nú hann skal kappast við eina rúgvu av peningasterkum útlendskum rásum. Nú Sjónvarpið ikki longur er á fíggjarlógini, er neyðugt, at stovninum verða veittir møguleikar at breiðka inntøkugrundarlagið, uttan at hetta nervar landskassan.

Av tí at tað í ávísum førum kann gerast trupult hjá Sjónvarpinum at halda eitt javnt gjaldføri alt fíggjarárið, nú stovnurin ikki longur hevur nakað fast ískoyti úr landskassanum, mælir landsstýrið til, at stovnurin sum eina trygd fær heimildir til at taka neyðug lán til gjaldførið innan karmarnar á teirri av landsstýrinum góðkendu fíggjarætlanini.

Landsstýrið heldur, at landið eigur at hava ábyrgdina av sendinetinum til bæði sjónvarps- og útvarpssendingar og bera kostnaðin av teimum. Telefonverk Føroya Løgtings hevur sendinetini um hendi. Ífigartil hevur landskassin rindað fyri íløgur í sjónvarpssendinetið, meðan Sjónvarpið hevur goldið fyri raksturin. Landsstýrið heldur, at Sjónvarpið hereftir skal brúka inntøkur sínar til at framleiða og senda so nógv og gott tilfar, sum tilber.

Lóggáva viðvíkjandi elektromagnetiskari órógv eigur at vera endurskoða í samband við áselan av, hvør hevur ábyrgd av hesum øki sum heild.

Mælt verður til, at sjónvarpsstjórin hevur ábyrgdina av stovninum mótvegis landsstýrnum sambært reglum, sum landsstýrið ásetur. Landsstýrið skal framvegis góðkenna fíggjarætlanir, og áseta sjónvarpsgjaldið.

Landsstýrið mælir til, at skipanin við sjónvarpsnevndini verður varðveitt. Nevndin verður ein ráðgevandi programmnevnd, ið sum heild fer at virka eins og núverandi sjónvarpsnevnd.

Hóast Sjónvarp Føroya fær einkarrætt at senda sjónvarpssendingar, sum burturav eru ætlaðar føroyskum umráði, fara føroyingar í komandi tíðum at hava algongd til eina ørgrynnu av øðrum rásum. Landsstýrið heldur tað vera neyðugt, at niðurtøkan og útbreiðslan av rásum til fleiri húsarhald í senn, eigur at verða regulerað við lóg og kunngerðum, eins og gjørt verður í grannlondum okkara.

Hesi lond hava eisini reglur, sum áseta, at felags antennuútbúnaðir yvir eina ávísa stødd skulu breiða út tær stóru nationalu sjónvarpsrásirnar.

Víst verður annars til viðmerkingarnar til tær einstøku greinirnar.

<u>Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:</u>

ad § 1, stk. 1. Skotið verður upp, at verandi skipan við einkarrætti verður varðveitt.

ad § 1, stk. 2. Mælt verður til, at landið yvirtekur alla ábyrgd av sendinetinum, ið TLF sum higartil skal umsita.

ad § 2, stk. 2. Henda regla er ikki í galdandi lóg. Hon áleggur Sjónvarpi Føroya at luttaka í eini tilhúgvingarætlan, tá hendan er gjørd.

ad § 2, stk. 3. Landsstýrið heldur tað vera hóskandi, at loyvini til at tryggja Sjónvarpi Føroya eitt inntøkugrundarlag - eitt nú við lýsingum, spølum og øðrum tiltøkum - verða beinleiðis ásett í lógini.

ad § 3, stk. 1. Greinin ásetur tær skyldur, sum Sjónvarpið hevur í sínum programvirksemi.

ad § 3, stk. 2. Eftir galdandi lóg hevur sjónvarpsnevndin, sum er ein politiskt vald nevnd, formliga allan avgerðarrættin viðvíkjandi programmvirksemi Sjónvarpsins. Skotið verður upp, at nevndin verður ráðgevandi í programmspurningum, eins og galdandi er í Danmarks Radio.

ad § 4, stk. 1. Eftir galdandi skipan setur landsstýrið starvsfólkið í Sjónvarpinum. Mælt verður til, at landsstýrið skal seta sjónvarpsstjóran, sum annars setur hini starvsfólkini.

ad § 6. Greinin staðfestir galdandi mannagongd, sum er, at eitt hvørt húski rindar eitt sjónvarpsgjald fyri móttakararnar hjá tí, sum rindar, og húsfólki, ið hann er uppihaldari hjá.

ad § 9. Hetta er ein nýggj grein, sum snýr seg um loyvi hjá kommunum at taka niður og útbreiða útlendsk sjónvarpssignal. Hetta broytir tó ikki møgulig krøv til loyvir eftir aðrari lóggávu, sum t.d. eftir radiokommunikatiónslógini.

ad § 10. Hetta er somuleiðis ein nýggj grein. Hon snýr seg um loyvi at taka niður og útbreiða Sjónvarp Føroya og útlendskar sjónvarpsrásir um felags antennuútbúnað.

1. viðgerð 13. mars 1996. Málið varð beint í mentanarnevndina, sum 26. april 1996 legði fram sotjóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 7. mars 1996 og eftir 1. viðgerð tann 13. mars 1996 beint í mentannarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur innkallað til fundar í nevndini landsstýrismannin í mentamálum Sámal Petur í Grund, Tróndur Djurhuus, sjónvarpsstjóra, umframt umboð fyri nevndina, sum á sumri 1991 gjørdi álit um útvarp, sjónvarp og aðrar fjølmiðlaspurningar.

Harumframt hevur nevndin havt fund við sjónvarpsnevndina, Føroya Blaðmannafelag og umboð fyri áhugabólkar.

Eisini hevur nevndin vitjað Sjónvarp Føroya.

Nevndin heldur ikki, at uppskot landsstýrisins fevnir um allar teir spurningar, ein slík lóg eigur at fevna um. Nevndin heldur, at orðingarnar í lógargreinunum ikki í øllum førum eru nóg greiðar, eins og viðmerkingarnar til greinarnar ikki nóg týðiliga greiða frá uppskotinum. Umframt hetta kunnu partar av nevndini ikki taka undir við fleiri av ásetingunum í lógaruppskotinum.

Vísandi til, at uppskot til nýggja útvarpslóg eisini er lagt fyri tingið hevur nevndin viðgjørt spurningin, um vit eiga at hava eina ella tvær lógir á hesum øki. Nevndin heldur, at rettast er at hava eina lóg, sum fevnir um bæði útvarp og sjónvarp.

Spurningurin viðvíkjandi einkarrættinum at senda útvarp og sjónvarp er gjølla viðgjørdur, herundir eisini spurningurin um møguleikarnar hjá privatum at sleppa at gera sendingar í sjónvarpinum (Bandverkstað).

Nevndin er samd um, at vit eiga at hava eitt meginsjónvarp, sum verður stuðlað á fíggjarlógini. Men nevndin heldur, at onnur skulu fáa loyvi at senda sjónvarp í Føroyum, tó uttan fíggjarliga byrðu fyri tað almenna. Umframt at møguleikar skulu vera hjá privatum at gera sendingar í sjónvarpinum. (Bandverkstað)

Neyðugt verður tí eisini í lógini at áseta neyvari treytir fyri sendiloyvi til nærsjónvarp og áhugabólkar. Spurningurin um loyvi at taka niður sendingar er eisini viðgjørdur og nevndin kann ikki taka undir við teimum avmarkingum, sum eru ásettar í lógaruppskotinum.

Nevndin heldur skipanina við sjónvarpsgjaldinum verða ógreiða, og spurningurin um heimildina hjá sjónvarpinum at taka upp lán eigur at verða umhugsaður. Nevndin skilir teir trupulleikar, sum kunnu verða við gjaldførinum partar av árinum, men neyðugt verður at tryggja, at stovnurin ikki kemur í fíggjarligt óføri.

Í viðmerkingunum til uppskot landsstýrisins verður sagt, at landsstýrið í arbeiðnum við at gera lógaruppskotið hevur nýtt álitið frá 1991 um útvarp, sjónvarp og aðrar fjølmiðlaspurningar. Nevndin hevur tó ilt við at síggja, hvørja ávirkan hetta tilfar hevur havt á lógaruppskotið, og spurningarnir í álitinum tykjast eftir nevndarinnar meting als ikki liknir við í hesum uppskoti.

Mentannarnevndin hevur umhugsað at gera broytingar í uppskoti landsstýrisins, men kom til tu niðurstøðu, at hetta er eitt arbeiði, landsstýrið eigur at gera, og heitir nevndin tí á landsstýrið um at gera nýtt uppskot til løgtingslóg, sum ásetir allar heimildir í samband við útvarp og sjónvarp.

Mentannarnevndin heitir á landsstýrið um at taka við tey sjónarmið, sum verða lagd fram í hesum áliti og í álitinum frá 1991 og leggja lógaruppskotið fyri tingið í seinasta lagi 1. oktober 1996.

Nevndin tekur sostatt ikki undir við uppskoti landsstýrisins, men nevndin er greið yvir, at verandi lóg fer úr gildi 1. mai 1996 og at ikki ber til, at ongar lógarreglur eru á økinum. Nevndin heldur tí, at rettast er, at galdandi lóg heldur fram, til nýggj lóg er samtykt.

Tingmenn, ið hava umrøtt hetta mál, eru samdir um at lógaruppskot um at leingja galdandi lóg eigur at verða

lagt fram í tinginum. Tó er neyðugt, sambh. tingskipanini, at fáa 17 tingmenn at áteikna slíkt uppskot, nú tíðarfreistin at leggja fram uppskot er úti.

Boðað verður frá hesum.

2. viðgerð 30. apríl 1996. Uppskotið fekk 6-0-13 atkvøður og fall.

F.L. j.nr. 2260-1-91.

49 Løgtingslóg um útvarp

Ár 1996, hósdagin 7. mars legði Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um útvarp.

§ 1. Landið hevur gjøgnum Útvarp Føroya einkarrætt til at senda útvarp í Føroyum.
Stk. 2. Landsstýrið hevur ábyrgdina av útvarpssendinetinum, og landskassin ber allan kostnaðin av hesum. Telefonverk Føroya Løgtings umsitur útvarpssendinetið.

§ 2. Útvarp Føroya kann gera og senda útvarpssendingar í Føroyum, men kann eisini reka annað virksemi, sum náttúrligt er knýtt at uppgávum stovnsins.
Stk. 2. Útvarp Føroya skal luttaka í landsumfatandi tilhúgvingarætlanum.
Stk. 3. Landsstýrið kann loyva Útvarpi Føroya at skipa fyri inntøkugevandi tiltøkum, heruppí eyðuspølum og at senda lýsingar. Inntøkur hjá Útvarpi Føroya kunnu einans nýtast til útvarpsendamál.
Stk. 4. Gjøldini fyri lýsingar sambæt stk. 3 skulu góðkennast av landsstýrinum.

§ 3. Programmvirksemið hjá Útvarpi Føroya skal fevna um tíðindaflutning, upplýsing, undirhald og mentan. Í programmvirkseminum skal dentur verða lagdur á eitt saklígt og óheft upplýsingarvirksemi, talufrælsi og eitt fjøltáttað programmtilboð.
Stk. 2. Landsstýrið velur eina nevnd við 5 limum sum ráðgevur Útvarpi Føroya viðvíkjandi programmvirksemi stovnsins. Landsstýrið kann eftir tilráðing frá lurtarafeløgum, sum frammanundan hava fingið góðkent tilráðingarheimild frá landsstýrinum, nøra um nevndina við einum limi. Limirnir fáa samsýning og ferðaútreiðslur goldnar eftir reglum landsstýrisins um fundarpening og ferðapening.
Stk. 3. Nevndin ger sjálv starvsskipan sína, sum skal góðkennast av landsstýrinum.

§ 4. Landsstýrið setir stjóran á Útvarpi Føroya, sum eftir nærri reglum, ið landsstýrið ásetir, hevur leiðsluna av stovninum. Stjórin á Útvarpi Føroya setir starvsfólk annars á stovninum.
Stk. 2. Nevndin eftir § 3, stk. 2 verður vald fyri 4 ár, tó so at nevndarlimur verður sitandi, til nýggjur limur er valdur. Samstundis verða vald persóndig varalólk. Landsstýrið tilnevnir formannin í nevndini.

§ 5. Ársroknskapurin hjá Útvarpi Føroya skal grannskoðast av løggildum grannskoðara, og góðkennast eftir reglunum fyri almennar roknskapir. Roknskaparárið fylgir almanakkaárinum.
Stk. 2. Útvarpi Føroya er heimilað, við landsstýrisins loyvi, í hvørjum einstøkum føri innan karmarnar av góðkendari lívgjarætlan stovnsins at taka upp neyðugt lán, sum tó í mesta lagi kann vera 25% av inntøkunum av útvarpsgjaldinum árið frammanundan til at tryggja stovnsins gjaldføri.

§ 6. Hvørt húski, stovnur, virki, handil, skip, v.m., jbr. tó stk. 2, sum hevur útvarpshartiól, skal rinda útvarpsgjald til Útvarp Føroya.
Stk. 2. Landsstýrið ger nærri reglur um, hvørji tól

koma undir gjaldskyldu, og nær gjaldskyldan heldur uppat.

§ 7. Landsstýrið ásetir, eftir ummæli frá Útvarpi Føroya, útvarpsgjaldið fyri ein ella fleiri ár í senn.
Stk. 2. Landsstýrið ásetir nærri reglur um avgreiðslugjald, eykagjald fyri ov seint goldið útvarpsgjald og um innheintingargjald.
Stk. 3. Gjøldini, ið nevnd eru í stk. 1 og 2, kunnu krevjast inn við panting.

§ 8. Øll, sum útvega sær útvarpslurtitól, skulu beinanvegin boða Útvarpi Føroya frá. Tey, sum selja ella láta frá sær útvarpslurtitól, skulu skrivliga boða Útvarpi Føroya frá innan 10 dagar.
Stk. 2. Landsstýrið ásetir nærri reglur um fráboðanarskyldina.
§ 9. Ongum er heimilað at leggja nýggjar leiðningar, so teir nerva leiðningar útvarpsins ella tól, sum standa í samband við teir.
Stk. 2. Hevur persónur ella kommuna el leiðningar ella tól, sum skapa trupulleikar fyri nýtslu útvarpsins, er Útvarpi Føroya heimilað fyri rokning eigaranis at gera tørvandi fyriskipanir at byrgja fyri tíllkum.
Stk. 3. Tað er loyvt eftirlitinum hjá Útvarpi Føroya í eftirlitsørindum at fara um annan mans grund og inn í hús, men má tá sigast frá frammanundan.

§ 10. Í kirkjur, sjónleikarhús, samkomuhús, skúlar, veitingarhús og rúm, sum annars verða nýtt til almennar skemtanar ella fundir, skal Útvarpi Føroya verða heimilað uttan endurgjald at leggja tørvandi leiðningar í útvarpssendamáli.
Stk. 2. Heimilað er Útvarpi Føroya at upptaka og varpa út uttan endurgjald frá almennum fundum og tilløkum. Útvarp Føroya skal tó frammanundan boða teimum frá, ið skipa fyrt.

§ 11. Brot móti hesi lóg koma undir sekt. Málini veru framd sum løgreglumál, tó so at reglurnar í rettargangslógini deild 68 og 69 vera tilsvarandi nýtar sum í málum statsadvokaturin fremur.
Stk. 2. Landsstýrinum verður heimilað at royna at fremja mál um brot móti lógarinnar § 7 sum fyrisitingarmál.

§ 12. Henda lóg kemur í gildi 25. mars 1996. Samstundis fara úr gildi løgtingslóg nr. 23 frá 28. mars 1956 um útvarp, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 88 frá 13. juni 1995 og løgtingslóg nr. 11 frá 14. februar 1957 um útvarpsnevnd sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 171 frá 22. desember 1995.

Viðmerkingar:

Galdandi útvarpslóg er frá 1956, og hon hevur leingið verið ótíðarbóskandi. Umstøðurnar eru nógv broyttar, og møguligt er ikki longur til fulnar at fylgja ásetingunum í lógini. Tørvur er á at endurskoða lógina.

Í 1990 setti landsstýrið eina nevnd at gera álit um útvarp, sjónvarp og aðrar fjølmiðlaspurningar. Nevndin legði fram álit á sumri í 1991. Seinni ummæltu útvarpið, sjónvarpið, útvarpsnevndin og sjótvarpsnevndin álitið. Arbeiðið at endurskoða og dagføra útvarpslógina kom tó ikki víðari tá, men hetta tilfarið er tikið við í viðgerðina, nú landsstýrið hevur tikið stig til at endurskoða lóggávuna.

Landsstýrið heldur, at alt útvarpsvirksemið framhaldandi eigur at verða rikið innan karmarnar hjá Útvarpi Føroya. Við avmarkaða fólkagrundarlagnum í Føroyum og avmarkaðu fíggjarorkuni í huga, er tað av týðningi, at vit hava eitt útvarp, sum er ført fyri eftir førimuni at røkja samfelagsligu og mentanarligu uppgávurnar. Umframt at røkja sína uppgávu sum landsútvarp, er útvarpið í programmvirksemi sínum bæði í formi og innihaldi í stóran mun skipað sum økisútvarp í øðrum londum. Við verandi programmvirksemi hevur almenningurin góða atgongd til at luttaka í sendingum útvarpsins, og ein munandi partur av sendingunum verður framleiddur av fólki, ið ikki eru í føstum starvi í útvarpinum.

Landsstýrið heldur somuleiðis, at útvarpið og sjónvarpið framhaldandi eiga at verða rikin sum tveir sjálvstøðugir stovnar. Stovnarnir hava í dag samstarv á fleiri økjum, men royndirnar hava vist, at samstarvsmøguleikarnir eru avmarkaðir, tí hesir fjølmiðlar eru sera ymiskir og seta ymisk krøv. Skipanin við tveimum sjálvstøðugum stovnum hevur í royndi og veru havt við sær, at einkarrætturin á elektroniska fjølmiðlaøkinum er brotin.

Rakstur útvarpsins verður líggjaður við inntøkum, sum stovnurin sjálvur útvegar. Í fyriliggjandi uppskoti verður inntøkugrundarlagið hjá stovninum framhaldandi útvarpsgjald, útvarpslýsingar og V4-spælið. Tó heldur landsstýrið, at landið eigur at hava ábyrgdina av útvarpssendinetinum og skal bera kostnaðin av

hesum. Telefonverk Føroya Løgtings skal hava umsitingina av útvarpssendinetinum um hendi.

Higartil hevur landskassin goldið fløgur í sendinetið, meðan útvarpið hevur borið raksturin. Serliga raksturin av nýggju millumbylgjusendistøðini er dýrur, hóast nýtslan av honum er avmarkað. MB-sendistøðin varð bygd fyrst og freinst fyri at geva føroyskum sjónvarpinum høvi til at hoyra útvarpið. Tey fyrstu árini rindaði landskassin allan raksturin, men tey seinastu árini hevur útvarpið rindað meginpartin av rakstrinum. Í sama tíðarskeiði er inntøkugrundarlagið hjá stovninum minkað samsvarandi búskaparligu gongdini í samfelagnum, og hildið verður, at skal útvarpið rinda meginpartin av rakstrinum av MB-sendistøðini, verður mett, at hetta í ov stóran mun fer at avmarka møguleikarnar fyri programmvirkseminum.

Lóggáva viðvíkjandi elektromagnetiskari órógv eigur at vera endurskoðað í sambandi við ásetan av, hvør hevur ábyrgd av hesum øki sum heild.

Mælt verður til, at útvarpsstjórin skal hava ábyrgdina av stovninum yvirfyri landsstýrinum, sum skal góðkenna fíggjarætlan og áseta útvarpsgjaldið.

Landsstýrið mælir til, at skipanin við útvarpsnevndini verður varðveitt. Nevndin verður ein ráðgevandi programmnevnd, og í prinsippinum skal virka á sama hátt sum verandi útvarpsnevnd.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

ad § 1, stk. 1. Skotið verður upp, at verandi skipan við einkarætti verður varðveitt.

ad § 1, stk. 2. Mælt verður til, at landið yvirtekur alla ábyrgd av sendinetinum, ið TFL sum higartil skal umsita.

ad § 2, stk. 2. Henda regla er ikki í galdandi lóg, og áleggur útvarpinum at luttaka í eini tilbúgvingarætlan, tá henda er gjørd.

ad § 2, stk. 3. Landsstýrið heldur tað vera bóskandi, at loyvi til útvarpslýsingar og útvarpskunngerðir verður heinleiðis ásett í lógini. Tað sama er galdandi fyri onnur inntøkugevandi tiltøk, sum t.d. eydnuspøl v.m.

ad § 3, stk. 1. Greinin ásetir tær skyldur, sum útvarpið hevur í sínum programmvirksemi.

ad § 3, stk. 2. Eftir galdandi lóg hevur útvarpsnevndin, sum er ein politiskt vald nevnd, formliga allan avgerðarrættin viðvíkjandi programmvirksemi útvarpsins. Skotið verður upp, at nevndin verður ráðgevandi í programmspurningum, ið er sama skipan sum fyri eitt nú Danmarks Radio.

ad. § 4, stk. 1. Eftir galdandi skipan setir landsstýrið øll starvsfólk. Mælt verður til, at landsstýrið skal seta útvarpsstjóran, sum annars setir hini starvsfólkini.

ad § 6, stk. 1. Eftir galdandi lóg skal útvarpið krevja útvarpsgjald fyri hvørm móttakara. Greinin staðfestir galdandi mannagongd, sum er, at eitt húski rindar eitt gjald fyri móttakararnar hjá tí, ið rindar og húsfólki, ið hann er uppihaldari hjá.

1. viðgerð 13. mars 1996. Málið verð heint í mentannarnevndina, sum 26. apríl 1996 legði fram søljóðandi

Á l i t

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 7. mars 1996 og eftir 1. viðgerð tann 13. mars 1996 heint í mentannarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur í hesum sambandi innkallað landsstýrismannin í mentanarmálum Sámal Petur í Grund, og Jógvan Jespersen, útvarpsstjóra, umframt umboð fyri nevndina, sum á summri 1991 gjørdi

álit um útvarp og sjónvarp og aðrar fjølmiðlaspurningar.

Nevndin hevur harumframt verið á vitjun í Útvarp Føroya.

Nevndin heldur ikki, at uppskotið fevnir um allar teir spurningar, ein stík lóg eigur at fevna um. Nevndin heldur, at orðingarnar í lógargreinunum ikki í øllum førum eru nóg greiðar, eins og viðmerkingarnar til greinarnar ikki nóg týðiliga greiða frá uppskotinum. Umframt hetta kunnu partar av nevndini ikki taka undir við fleiri av ásetingunum í lógaruppskotinum.

Vísandi til, at uppskot til nýggja sjónvarpslóg eisini er lagt fyri tingið, hevur nevndin viðgjørt spurningin um vit eiga at hava eina ella tvær lógir á hesum øki. Nevndin heldur, at rættast er at hava eina lóg, sum fevnir um bæði útvarp og sjónvarp.

Spurningurin viðvíkjandi einkarrettinum at senda útvarp og sjónvarp varð gjølla viðgjørdur, herundir eisini spurningurin um møguleikarnar hjá privatum at sleppa at gera sendingar í útvarpinum.

Nevndin er samd um, at vit eiga at hava eitt meginútvarp, sum verður studlað á fíggjarlógini. Men nevndin heldur, at onnur skulu fáa loyvi at senda útvarp í Føroyum, tó uttan fíggjarliga byrðu fyri tað almenna.

Neyðugt verður tí eisini í lógini at áseta neyvari reglur fyri sendiloyvi til nærvarp og áhugabólkar.

Í viðmerkingunum til uppskot landsstýrisins verður sagt, at landsstýrið í arbeiðinum við hesum lógaruppskoti hevur nýtt álitið um útvarp, sjónvarp og aðrar fjølmiðlaspurningar, sum ein nevnd á sumri 1991 legði fyri landsstýrið. Nevndin hevur ilt við at síggja, hvørja ávirkan hetta tilfar hevur havt á uppskotið, við tað, at spurningarnir í álitinum als ikki eru tiknir við í tilfarið, sum landsstýrið hevur lagt fyri løgtingið saman við hesum uppskoti.

Mentannarnevndin hevur umhugsað at gera broytingar í uppskoti landsstýrisins, men kom til ta niðurstøðu, at hetta er eitt arbeiði, landsstýrið eigur at gera, og heitir nevndin tí á landsstýrið um at gera nýtt uppskot til løgtingslóg, sum ásetir allar heimildir í sambund við útvarp og sjónvarp.

Mentannarnevndin heitir á landsstýrið um at taka við tey sjónarmið, sum verða lørd fram í hesum áliti og álitinum frá 1991 og leggja lógaruppskotið fyri tingið í seinasta lagi 1. oktober 1996.

Nevndin tekur sostatt ikki undir við uppskoti landsstýrisins.

2. viðgerð 30. apríl 1996. Uppskotið fekk 6-0-13 atkvøður og fall.

F.L. j.nr. 2250-I/91.

50 Broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi

Ár 1996, hósdagin 7. mars legði Johannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 120 frá 23. desember 1994 um avgjald á framleiðslu og innflutningi verða í frumskjølunum, ið nevnd eru í §§ 2 og 4 í lógini, gjørdar hesar broytingar:

1) Í frumskjali 1 til toll- og vøruskránna ganga øll numrini í vørubólki 8521 út.

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar:

Endamálið við uppskotinum er at taka 30% avgjaldið á grammofonplátum, bandum, fløgum og sjónbondum av, og hervið vaksa um søluna og skapa økt virksemi í tónleikalívinum.

Eisini verður hildið, at umsitingin er órímiliga stór av hesum vørubólki í mun til inntøkuna hjá landskassanum.

Tá sínamillum handilssáttmálin millum felagsmarknaðin og Føroyar kom í gildi, (seinni eru onnur lond komin afturat), skuldi ikki gerast munur á innflutttum vørum úr hesum londum og føroyskt framleiddum vørum.

Punktgjaldið varð tá tikið av nógvum vørum, og fáar eru eftir, sum hava punktgjald, har eisini er framleiðsla á føroyska heintamarkraðinum.

Av vørubólkunum sum nevndir eru í báðum lógaruppskotunum, verða vøtur og partar av vørum framleiddar í Føroyum, og er tí framleiðslugjald á hesum vørum, sum gevur nógva og trupla umsiting í mun til inntøkuna.

Eitt avgjald uppá 30% umfram meirvirðisgjald hevur havt við sær, at torfort er at framleiða føroyskar tónleikavørur, tí framleiðslu- og søluprísurin gerst ov høgur. Her er sostatt talan um eitt avgjald, ið hevur negativa ávirkan á tónleikalívið. Avgjaldið ger, at sølan av tónleiki er avmarkað, og framleiðslan næstan ikki loysir seg. Hettar fordar tónleikarum at geva tónleik- og sjónbond út.

Inntøka landskassans í punktgjaldi fyri hesar vørur var í 1994 1,2 mió. kr., ið landskassin missir beinleiðis í punktgjaldi, men roknast má við, at taka punktgjaldið av, fer at hava ein lægri útsøluprís við sær, og harvið eina økta sølu, ið vil geva landskassanum peningin aftur í fleiri mvg- og skattakrónum.

Hetta, at framleiðslu- og útsøluprísurin lækkar, kemur tónleikalívinum til góðar, og fer at vera við til at bøta um grundarlagið hjá ungum nýggjum tónleikarum, ið royna seg við útgávu av nevndu vørum.

At enda skal viðmerkjast, at nú eru Føroyar einasta landið um okkara leiðir, ið hevur punktgjald á framleiðslu og innflutningi av grammofonplátum, bandum, fløgum og sjónbondum.

Viðmerkingarnar eru tær somu sum í løgtingsmáli nr. 51/1995.

1. viðgerð 13. mars 1996. Málið verð beint í fíggjarnevndina, sum 19. mars 1996 legði fram soljóðandi

Ólit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 7. mars 1996, og eftir 1. viðgerð tann 13. mars 1996 beint í fíggjar nevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 18. mars 1996. Ein samd nevnd tekur undir við uppskoti landsstýrisins, og mælir løgtinginum til at samtykkja tað.

Undir viðgerðini í nevndini er spurningur um at gera somu broytingar viðvíkjandi øðrum líknandi vørubólkum, sum mest verður keypt av í útlondunum, av tí at vøran vegna punktgjøld og toll er ov kostnaðarmikil í Føroyum, stungið seg upp.

Nevndin heldur, at landsstýrið skuldi umhugsa at lagt uppskot fyri tingið, um broytingar av líknandi slag í hesum lógum.

2. viðgerð 21. mars 1996. Samtykt at beina málið til 3. viðgerð við 27-0-0 atkvøðum.

3. viðgerð 26. mars 1996. Málið endaliga samtykt við 17-0-0 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 35 frá 16. apríl 1996.

F.L., j.nr. 2520-24/91.

51 Broyting í løgtingslóg um toll

Ár 1996, hósdagin 7. mars legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um toll.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 121 frá 23. desember 1991 um toll verður í frumskjalinum, ið nevnt er í § 16, stk. 4, gjørd henda broyting:

1) Í frumskjali 2 til toll- og vøruskránna gongur hesin TS-vøruflokkur út: "9916.08.00, avgjald 30%".

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar:

Endamálið við uppskotinum er at taka 30% avgjaldið á grammofonplátum, bondum, fløgum og sjónbondum av, og hervið vaksa um søluna og skapa økt virksemi í tónleikalívinum.

Eisini verður hildið, at umsitingin er órímiliga stór av hesum vørubólki í mun til inntøkuna hjá landskassanum.

Tá sínamillum handilssáttmálin millum felagsmarknaðin og Føroyar kom í gildi, (seinni eru onnur lond komin afturat), skuldi ikki gerast munur á innfluttum vørum úr hesum londum og føroyski framleiddum vørum.

Punktgjaldið varð tá tikið av nógvum vørum, og fáar eru eftir, sum hava punktgjald, har eisini er framleiðsla á føroyska heimamarknaðinum.

Av vørubólkunum sum nevndir eru í báðum lógaruppskotunum, verða vørur og partar av vørum framleiddar í Føroyum, og er tí framleiðslugjald á hesum vørum, sum gevur nógva og trupla umsiting í mun til inntøkuna.

Eitt avgjald uppá 30% umfram meirvirðisgjald hevur havt við sær, at torført er at framleiða føroyskar tónleikavørur, tí framleiðslu- og søluprísurin gerst ov høgur. Her er sostatt talan um eitt avgjald, ið hevur negativa ávirkan á tónleikalívið. Avgjaldið ger, at sølan av tónleiki er avmarkað, og framleiðslan nestan ikki loystr seg. Hettar forðar tónleikarum at geva tónleik- og sjónbond út.

Inntøka landskassans í punktgjaldi fyri hesar vørur var í 1994 1,2 mió. kr., tó landskassin missir beinleiðis í punktgjaldi, men roknast má við, at taka punktgjaldið av, fer at hava ein lægri útsøluprís við sær, og harvið eina økta sølu, ið vil geva landskassanum peningin aftur í fleiri mvg- og skattakrónum.

Hetta, at framleiðslu- og útsøluprísurin lækkar, kemur tónleikalívinum til góðar, og fer at vera við til at bøta um grundarlagið hjá ungum nýggjum tónleikarum, ið royna seg við útgávu av nevndu vørum.

At enda skal viðmerkjast, at nú eru Føroyar einasta landið um okkara leiðir, ið hevur punktgjald á framleiðslu og innflutningi av grammofonplátum, bondum, høgum og sjónbondum.

Viðmerkingarnar eru tær somu sum í løgtingsmáli nr. 50/1995.

1. viðgerð 13. mars 1996. Málið verð beint í fíggjarnevndina, sum 19. mars 1996 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 7. mars 1996, og eftir 1. viðgerð tann 13. mars 1996 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 18. mars 1996. Ein samd nevnd tekur undir við uppskoti landsstýrisins, og mælir løgtinginum til at samykkja tað.

Annars verður vístt til álit í løgtingsmáli nr. 50/1995.

2. viðgerð 21. mars 1996. Samtykt at beina uppskotið til 3. viðgerð við 27-0-0 atkvøðum.

3. viðgerð 26. mars 1996. Málið endaliga samtykt við 18-0-0 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 36 frá 16. apríl 1996.

F.L. j.nr. 2520-24/91.

52 Broyting í løgtingslóg um hvalaveiðu

Ár 1996, týsdagin 12. mars legði Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður, vegna hvan Johannesen, landsstýrismann, fram soljóðandi

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um hvalaveiðu.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 57 frá 5. juni 1984 um hvalaveiðu við seinni broytingum verður gjørd henda broyting:

Í § 4 verða sum stk. 3 og stk. 4 sett:

"Stk. 3. Friðaður hvalur, sum ger landgongd ella kemur í líknandi støðu og má avlívast smb. lóg um vernd av dýrum, er ogn hjá landinum. Landsstýrinum er heimilað at gera reglur ella taka avgerð um, hvussu slíkur hvalur skal skiftast.

Stk. 4. Hvalur, sum ger landgongd ella kemur í líknandi støðu, og sum verður funnin deyður ella sjálvdoyr, er ogn hjá landinum."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar:

Í § 4 í løgtingslóg um hvalaveiði er neyðugt at seta eitt stykki aftrat, sum hevur til endamáls at fáa greiði á, hvat skal gerast við friðaðan hvat, sum ger landgongd ella kemur í líknandi støðu og má avlívast. Sum er, eigur hvalur, sum kemur á land, at roknast sum reki og kemur undir reglurnar fyri hesum.

Við heimild í løgtingslóg um hvalaveiði eru reglurnar um døglingsbýti settar úr gildi. Hetta kemst av, at døglingur sambært altjóða hvalaveiðimevndini IWC er friðaður. Ger døglingur landgongd og má avlívast, kann landsstýrið avgera, at reglurnar um døglingsbýti kunnu vera guddundi fyri hettu.

Fyri annan hval fær landsstýrið heimild at taka støðu í hvørjum einstøkum føri ella at gera nærri reglur um, hvussu gongdin skal vera.

Fyri deyðan hval eigur landsstýrið at hava møguleika at fáa slíkan hval til settis. Talan kann vera um sjáldsaman hvat, sum hevur savnsvirði ella granskingarábuga. Samstundis kemur landsstýrið at bera møguligar útreiðstur av burturbeining av slíkum hvali.

1. viðgerð 19. mars 1996. Málið vurð beint í vinnunevndina, sum 9. apríl 1996 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 12. mars 1996 og eftir 1. viðgerð tann 19. mars 1996 beint í vinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið. **Ein samd nevnd** tekur undir við málinum, og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 22. apríl 1996. Samtykt við 19-0-0 atkvøðum at beina málið til 3. viðgerð.

3. viðgerð 15. mai 1996. Málið endaligu samtykt við 24-0-0 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 54, 20. mai 1996.

F.L. j.nr. 1570-2/90.

53 Uppskot til lóg um Fíggingargrunnin frá 1992

Ár 1996, týsdagin 12. mars legði Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður, vegna Axel Nolsøe, landsstýrismann, fram soljóðandi

Uppskot

til

ríkislógartilmæli

Fólkatinginum verður mælt til at samtykkja og hennara hátign drotningini at seta í gildi í Føroyum lóg um Fíggingargrunnin frá 1992 við hesum orðaljóði:

"Lóg um Fíggingargrunnin frá 1992.

§ 1. Í viðtøkubroyting fyri Fíggingargrunnin fyri 1992 kann ásetast, at grunnurin kann luta út ogn til Føroya Landsstýri, um so er, at ognin stavar frá dóttirfeløgum, ella stendst av lækking av stovnsfæi grunsins, ella stendst av útluting annars av eginpeningi grunsins. Eisini kann í viðtøkubroyting fyri Fíggingargrunnin frá 1992 ásetast, at um grunnurin verður avtikin, kann nettoyvirskotið rindast Føroya Landsstýri.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi (1. apríl 1996).

§ 3. Lógin er ikki galdandi fyri Grønland."

Det indstilles til Folketinget at vedtage og hendes majestæt dronningen at sætte i kraft på Færøerne lov om Finansieringsfonden af 1992 i følgende skikkelse:

"Lov om Finansieringsfonden af 1992.

§ 1. Det kan ved vedtægtsændring for Finansieringsfonden af 1992 bestemmes, at Fonden kan uddele midler til Færøernes Landsstyre, når midlerne hidrører fra datterselskaber eller er fremkommet som led i egenkapital iøvrigt. Det kan endvidere ved vedtægtsændring for Finansieringsfonden af 1992 bestemmes, at Fondens nettooverskud ved opløsning kan uddeles til Færøernes Landsstyre.

§ 2. Loven træder i kraft den (1. april 1996).

§ 3. Loven gælder ikke for Grønland."

Viðmerkingar:

Eftir roknskapinum hjá Føroya Banka fyri 1995 kemur Fíggingargrunnurin frá 1992 av sínum partapeningi í bankanum at fáa eitt vinningsbýti uppá umleið 35 mió. kr.

Fíggingargrunnurin ætlar at flyta landskassanum vinningsbýtið.

Flyting av vinningsbýtinum gevur tó stórar løgfrøðisligar trupulleikar, tí hetta krevur broyting í viðtøkunum fyri grunnin. Eftir galdandi lóg um vinnurekandi grunnar, er eingin heimild at lata stovnara av slíkum grunni sum Fíggingargrunninum, fáa pening aftur úr grunninum.

Sostatt er neyðugt við eini serstakari lóg fyri Fíggingargrunnin, har undantak verður gjørt frá lógini um vinnurekandi grunnar.

Verður hetta lógaruppskot samtykt, verður møguleiki fyri at broyta viðtøkurnar hjá Fíggingargrunninum solciðis, at yvirskot hjá grunninum kann latast landskassanum, eins og partur av stovnsfænum kann endurrindast landskassanum. Verður grunnurin avtikin, gevur lógin eisini møguleika fyri, at ogn grunsins kann fara í landskassan.

Vísandi til § 44 í tingskipanini kann upplýsast, at líggjarligur kostnaður ikki stendst av lógini, og heldur ikki øktar fyrisitingarligar arbeiðsbyrður.

Viðlagt fylgir eintak av lógaruppskotinum við viðmerkingum frá Vinnumálaráðnum.
Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

Ad § 1. Eftir uppskotinum fær landsstýrið og stjórnin heimild til at góðkenna broytingar í viðtøkunum fyri Fíggingargrunnin frá 1992 soleiðis, at grunnurin av sínum eginpeningi kann afturrinda innskjótaranum part av yvirskotinum, part av stovnspeninginum ella alla ogn grunsins, um hann verður avtikin.

Ad § 2. Ætlanin er, at lógin skal koma í gildi 1. apríl 1996.

1. viðgerð 19. mars 1996. Málið varð beint í rettarnevndina, sum 9. apríl 1996 legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 8. mars 1996 og varð eftir 1. viðgerð 12. mars 1996 beint í rettarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið. **Ein samd nevnd** tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja tað.

2. viðgerð 22. apríl 1996. Samtykt at beina málið til 3. viðgerð við 19-0-0 atkvøðum.

3. viðgerð 29. apríl 1996. Málið endaliga samtykt við 24-1-0 atkvøðum.

F.L. j. nr. 2571-7/93.

54 Broyting í løgtingslóg um landsjørð

Ár 1996, týsdagin 19. mars legði Axel Nolsøe, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsjørð.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 59 frá 9. juni 1988 um landsjørð við seinni broytingum verður § 18, stk. 3 strikað.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar:

Sambært § 8, nr. 2) í løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995 um broyting í ymsum ríkis- og løgtingslógum, sum viðvíkja landbúnaðarmálum v.m. í samband við at stýrisskipanarlógin fekk gildi, varð nýggj § 18, stk. 3 sett í løgtingslóg nr. 59 frá 9. juni 1988 um landsjørð, har tað varð ásett, at lógin um landsjørð fer úr gildi 1. apríl 1996.

Landsstýrið setti 30. november 1993 ein arbeiðsbólk, ið skal gera uppskot til landsstýrið viðvíkjandi framtíðar landbúnaðarvinnu í Føroyum, herundir eisini umskipa lógarverkið og gera uppskot um nýggjan bygnað

í umsitingini av landbúnaðarmálum.

Nevndin fer at leggja uppskotið fyri landsstýrið við ársbyrjun 1997, og er tíðin, eftir landsstýrisins tatan, ikki komin at seta verandi lóggávu úr gildi, fyrr enn nýggj skipan av landbúnaðarøkinum er komin í gildi, og verður av hesi orsøk uppskot lagt fram um at strika § 18, stk. 3 í lógini.

1. viðgerð 21. mars 1996. Málið varð brint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

Anfinn Kallsberg legði fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

2. viðgerð

Í uppskoti landsstýrisins verða gjørdar hesar broytingar:

"§ 1. Í løgtingslóg nr. 59 frá 9. juni 1988 um landsjørð við seinni broytingum verður § 18, stk. 3 soljóðandi: "Henda lóg fer úr gildi 1. oktober 1996."

§ 2. Henda lóg kemur í gildi 1. apríl 1996."

Viðmerkingar:

Uppskot landsstýrisins gongur út uppá at framleingja verandi lóg uttan tíðaravmarking. Vit fáa nýggja stýrisskipan frá ólavsøku í ár, sum gevur hvørjum einstøkum landsstýrismanni ábyrgdina av sínum málsøkt yvirfyri løgtinginum.

Tá tað kemur til jarðarlóggávuna, situr eitt jarðarráð, valt av landsstýrinum, sum í fleiri førum hevur avgerðarrættin, uttan at landsstýrismaðurin kann ábyrgjast fyri hesar avgerðir yvirfyri løgtinginum. Tað ber tí ikki til við galdandi lóggávu at fáa avgerð og ábyrgd samskipaðar. Tí verður mælt til, at landsstýrið í seinasta lagi á ólavsøku í ár kemur við lógarbroytingum, sum innihalda, at avgerð og ábyrgd mótvegis løgtinginum koma uppá plass.

2. viðgerð 25. mars 1996. Broytingaruppskot til §§ 1 og 2 fekk 8-3-8 atkvøður og fall. Uppskot landsstýrisins varð samtykt við 14-2-5 atkvøðum.

3. viðgerð 28. mars 1996. Málið endaliga samtykt við 16-5-2 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 29 frá 29. mars 1996.

55 Løgtingslóg um endurstovnan av "Menningargrunni Ídnaðarins"

Ár 1996, týsdagin 12. mars legði Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður, vegna Axel Nolsøe, landsstýrismann, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um endurstovnan av "Menningargrunni Ídnaðarins".

§ 1. "Menningargrunnur Ídnaðarins", ið varð stovnsettur við løgtingslóg nr. 37 frá 26. juni 1973, sum fór úr gildi 1. januar 1996 sambært løgtingslóg nr. 82 frá 13. juni 1995, verður endurstovnaður við hesari lóg.

§ 2. Landsstýrið velur nevnd grunsins, sum telur 3 limir og 3 tiltakslimir. Landsstýrið velur formannin og tiltakslim hansara.
Stk. 2. Nevndin setur starvsfólk at fyriskipa dagliga raksturin og annars ráðgeva nevndini í týðandi spurningum.

§ 3. Uppgávan hjá nevnd og starvsfólki verður at skipa fyri innkrevjing og útlánum grunsins og fyri afturgjalding av lánum grunsins.

§ 4. Landsstýrið ásetur í kunngerð nærri reglur fyri virksemið hjá grunninum.

§ 5. Grunnurin gevur frá sær ársroknskap og ársfrágreiðing um virki grunsins. Roknskapurin skal grannskoðast av løggildum grannskoðara.

§ 6. Grunnurin er leysur av øllum skatti til land og kommunu.

§ 7. Heldur nevndin, at endamál grunsins ikki er til longur, ger nevndin tilmæli til landsstýrið um at taka grunnin av.
Stk. 2. Í hesum føri verður støða tikin um, hvussu verða skal við ognum grunsins.

§ 8. Henda lóg fær gildi frá 1. januar 1996.

Viðmerkingar:

Sambært løgtingslóg nr. 82 frá 13. juni 1995 fór løgtingslóg nr. 37 frá 26. juni 1973 um menningargrunn fyri ídnað, handverk og tænastufyritøkur úr gildi 1. januar 1996.

Grunnurin hevur seinastu árini verið hildin solventur við játtanum úr landskassanum, og er útlánsvirksemið steðgað upp. Grunnurin hevur ikki lánt út seinastu 3 árini. Nevnd og umsiting hava tí hesa tíðina havt til uppgávu at umsita ognirnar og útistandandi lán við tí fyri eyga at fáa sum mest til høldar, soleiðis at missurin hjá grunninum og tí almenna verður avmarkaður mest møguligt.

Lógin fór sum nevnt úr gildi á nýggjárinum, men eftir landsstýrisins meting er tað ikki rætt undir verandi umstøðum at endurstovna ella endurreisa Menningargrunnin við tí endamáli at veita lán til vinnufyritøkur. Fyrst eiga verandi almennu fíggingar- og stuðulsskipanir so sum Framtaksgrunnurin, Ábyrgdargrunnurin, Grunnurin til Ídnaðarfremjandi endamál, stuðul til nýggjar vinnur og stuðul til menning av liskivinnuni á landi at verða eftirmettar og greiða eigur at fáast á, hvussu vinnuframskipanirnar betri kunnu samskipast. Arbeiðið at endurskoða verandi vinnustuðulsskipanir er komið stutt ávegis, og verður væntandi ikki klárt at leggja fram í hesi tingsetuni.

Í sambandi við endurskoðanina av vinnuframapolitikkinum, umhugsar landsstýrið at avtaka Menningargrunnin. Framlagda lógaruppskotið hevur til endamáls at tryggja grunninum neyðuga lógargrundarlagið, so grunnurin kann fremja eina skilagóða innkrevjing, til landsstýrið er tilreiðar til endaliga støðutakan um framtíð grunsins.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

Ad § 1. Mett verður rættast formliga at endurstovna "Menningargrunn Ídnaðarins" við løgtingslóg, eisini hóast talan bert er um at greiða tær skyldur, ið grunnurin bevur eftir, tí hann í síni tíð varð stovnaður við løgtingslóg.

Ad § 2. Tað verður eisini mett rættast, at ein nevnd verður vald fyri grunnin, tí tað er nevndin, ið er leiðsla grunsins, og sum skal taka tær týðandi avgerðirnar. Hugsanin er, at eitt hjálparfólk verður sett at fyriskipa tað dagliga arbeiði og annars ráðgeva nevndini í týðandi spurningum.

Ad § 3. Uppgávan hjá nevnd og hjálparfólki verður bert at skipa fyri afturgjaldi av verandi útlánum, og at lán, sum grunnurin bevur, verða goldin. Nýggj útlán v.m. kunnu tí ikki latast.

Ad § 4. Heimild verður givin landsstýrinum við kunngerð at gera nýggjar viðtøkur fyri grunnin.

Ad § 5. Grunnurin skal framhaldandi lata ársroknskap og ársfrágreiðing.

Ad § 6. Grunnurin bevur áður verið og verður framhaldandi leysur av øllum skatti.

Ad § 7. Heimild verður givin landsstýrinum at avtaka grunnin eftir tilmæli frá nevndini. Í hesum føri tekur landsstýrið eisini avgerð um, hvussu verður við møguligum ognum grunsins.

Ad § 8. Ígildiskoma.

1. viðgerð 21. mars 1996. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 29. apríl 1996 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 12. mars 1996 og eftir 1. viðgerð tann 21. mars 1996 beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og hevur eisini boðsent formanninum fyri framtaksgrunninum til fundar í nevndini.

Formaðurin í framtaksgrunninum hevur greitt nevndini frá virkseminum hjá framtaksgrunninum og Menningargrunni Ídnaðarins.

Út frá tí frágreiðing, sum rættarnevndin hevur fingið, heldur nevndin tað vera rættast at endurstovna Menningargrunn Ídnaðarins, sum skotið verður upp í fyriliggjandi lógaruppskoti einamest tí, at tað fær fíggjarligar avleiðingar, um ikki grunnurin verður endurstovnaður, tí hann bevur framvegis skyldur mótvegis kreditorum grunsins eins og grunnurin er eigari av fastogn, og hevur útistandandi krøv. Av útistandandi krøvum verður hildið, at ein partur kann innheintast.

Nevndin heldur, tað vera umráðandi, at vit í Føroyum hava vælvirkandi vinnustuðulsskipanir. Nevndin hevur tí eisini lagt til merkis, at í viðmerkingunum til lógaruppskotið upplýsir landsstýrið, at arbeiðið við at endurskoða verandi vinnustuðulsskipanir er komið stutt áleiðis, og er tí heldur einki uppskot hesum viðvíkjandi lagt fram í hesi tingsetuni. Nevndin hevur soleiðis viðgjørt spurningin um vinnustuðulsskipanir sera gjølla, og heldur nevndin, at verandi vinnustuðulsskipanir eiga at verða endurskoðaðar og fáast at virka skjótast tilber. Her verður serliga hugsað um stuðul til smærri virkir og stuðul í samband við, at virkir verða sett á stovn ("íverksetarastuðul").

Eisini heldur nevndin, at neyðugt er at seta í verk eina kanning av vinnustuðulsskipaninum bæði teimum verandi og teimum, sum møguliga verða settar í gildi, soleiðis at upplýst verður, hvussu hesar skipanir virka.

og hvat t.d. hendir við virkjunum, tú stuðulstíðin er av, ella stuðulin er brúktur.
Rættarnevndin heitir tí á landsstýrið um fyrst í komandi tingseti at leggja fyri løgtingið frágreiðing og møguligt lógaruppskot viðv. vinnustuðulsskipanunum.

Vísandi til lógaruppskotið § 2, t. stk, 2. punktum, mælir meirilutin í rættarnevndini til, at nevndin fyri Menningargrunn Ídnaðarins skipar sig sjálv, av tí at hetta betri er í tráð við vanliga mannagongd á hesum øki.

Rættarnevndin mælir við hesum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 2. mai 1996. Samtykt at beina málið til 3. viðgerð við 26-0-0 atkvøðum.

3. viðgerð 8. mai 1996. Málið endaliga samtykt við 23-0-0 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 51, 20. mai 1996.

F.L. j.nr. 1206-10/95.

56 Broyting í løgtingslóg um javnstøðu millum kvinnur og menn

Ár 1996, týsdagin 19. mars legði Jenis av Rana, vegna miðflokkin fram saljóðandi

Uppskot

til

<u>løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um javnstøðu millum kvinnur og menn.</u>

§ 1.

Í Løgtingslóg nr. 52 frá 3. mai 1994 um javnstøðu millum kvinnur og menn verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 3, stk. 2, verður 3. punktum strikað.
2) § 7, stk. 1 verður strikað.
3) § 7, stk. 2 verður § 7, stk. 1.
4) § 8, stk. 1 verður orðað soleiðis:

"Miðað verður ímóti, at allar almennar nevndir, ráð, umboð og líknandi, sum fyrisitingarvaldið útnevnir, verða sett saman soleiðis, at umleið eins nógvir limir av báðum kynum eru umboðaðir. Sama er galdandi fyri tær nevndir, ráð, umboð og líknandi, sum løgtingið og bý- og bygdaráðini útnevna, tá ið tey, ið útnevnast skulu, ikki nýtast at vera løgtings- ella bý-/bygdaráðslimir."

5) § 8, stk. 2, verður strikað.
6) §§ 9, 10, 11 og 12 verða strikaðar.
7) §§ 13-15 verða hereftir §§ 9-11.
8) Í § 14, stk. 1, verður "§ 11" strikað.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir kunngerð.

Viðmerkingar:

Óivað hava tey rett, sum meta, at omanfyrinevnda lóg átti at verið tikin av, tí neyvan eru fleiri enn fáir føroyingar, sum geva teimum, sum aftan fyri hesa lóg "standa", rætt í, at kynsmunur verður fraundur her á

landi. Tó hevur **Miðflokkurin** hesa ferð valt at rætta tey mest eyðsýndu brekini, lógin hevur, við vón um, at fleirtal fæst á løgtingi fyri hesum.

Framsetta uppskotið snýr seg um at taka burtur og broyta **óhepnar** og beinleiðis **skaðiligar** greinir, og í øðrum **føri** heilt at taka burtur **eftir** okkara tykki **óneyðugur** partur av lógini.

At krevja, sum § 7, stk. 1, ger, at "Trálærutilfar til undervísing og uppaling barna skal samsvara javnstøðuhugsjónini í hesi lóg", má metast sum eitt álop á, og at vera í beinleiðis stríð við skúlalógina, sum í endamálsgrein sínari m.a. hevur: **"fólkaskúlin skal í sátt og samvinnu við heimini geva næmingunum eina kristna og siðalagsliga uppaling"**. Longu nú síggjast fylgjur av hesum, um t.d. lítið verður at vegleiðingunum frá Landsskúlafyrisitingini til lesiætlanir, og metir **Miðflokkurin**, at rættast er at fáa hesa grein burtur, áðrenn henni eydnast at valda óbøtandi skaða.

At krevja, at nevndir, ráð v.m. (§ 8) skulu verða sett saman soleiðis, at umleið eins nógvir limir av báðum kynum eru umboðaðir, hevur longu vist seg ógjørligt at liva upp til, og at halda fast við slíkt krav, er í botn og grund ódemokratiskt, ikki minst móti tí kyninum, sum til eina og hvørja tíð ikki megnar at uppfylla hetta kravið.

Miðflokkurin dugir ikki at síggja haldgóða orsøk til at hava eina javnstøðunevnd. Føroyar eru eitt rættarsamfelag á leið við onnur Norðurlond, har brot á lógir landsins fær fylgjur, uttan at tað í hvørjum einstøkum føri er neyðugt at hava eina nevnd ella eitt ráð sum millumlið millum borgaran, løgregluna og ákæruvaldið. Serliga í hesum døgum átti eitt hvørt høvi at rudda upp í "nevndarjunglu" okkara at verið kærkomið, og **Miðflokkurin** metir ikki, at hetta verður okkum at ógagni í hesum aktuella førimum, og fer tað eisini, um lítið verður at tí fíggjarligu síðuni at hava fyrimunir við sær.

1. viðgerð 26. mars 1996. Málið varð beint í rettarnevndina, sum 29. apríl 1996 legði fram søtjóðandi

Á lit

Málið er lagt fram av Miðflokkinum tann 15. mars 1996 og eftir 1. viðgerð tann 26. mars 1996 beint í rettarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meirilutu og minnilutu.

Meirilutin (Bjørn á Heygum, Sune Jacobsen, Ingeborg Vinter, Signar á Brimni, Marita Petersen) vilja varðveita verandi lóg óbroytta. Meirilutin tekur sostatt ikki undir við verandi broyting í javnstøðulógini og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Lasse Klein og Jógvan á Lakjuni) tekur undir við lógaruppskotinum.

Jógvan á Lakjuni mælir til at samtykkja lógaruppskotið, og annars heldur hann, at javnstøðulógin átti at verið tikin av, tí at hon er óneyðug í einum landi, har øll hava sama grundlógartryggjaðu rættindi, soleiðis at ikki ber til at gera mun á fólki, t.d. orsakað av hiðaliti ella kyni.

2. viðgerð 2. mai 1996. Uppskotið fekk 7-2-15 atkvøður og fall.

57 Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um frítíð við løn

Ár 1996, mikudagin 13. mars legði Ingeborg Vinther vegna seg sjálva og Jenis av Rana fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um frítíð við løn við seinni broytingum.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 30 frá 7. apríl 1986 við seinni broytingum um frítíð við løn verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 5, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Frítíðin er 30 dagar fyri fulla starvstíð í tíðarskeiðinum 1. apríl - 31. mars (innvinningarárið). Innvinningarárið kann í staðin vera almannakaárið, um hetta er ásett í sáttmála millum avvarðandi partar. Er starvstíðin styttri enn fult innvinningarár, verður frítíðin sett í mun til starvstíðina."

2) § 6 verður orðað soleiðis:
"Løntakari, ið ikki hevur vunnið rætt til frítíð við løn ella frítíðarløn í 30 dagar, hevur tó rætt til at taka frí uttan løn ella frítíðarløn í upp til eini 30 dagar í einum frítíðarári."

3) § 8. stk. 1, 1. punktum verður orðað soleiðis:
"Minst 24 dagar av frítíðini skulu gevast samanhangandi í tíðini 2. mai - 30. september (frítíðarskeiðið)."

4) § 8. stk. 2 verður orðað soleiðis:
"Frítíð út yvir teir 24 dagarnar kann verða givin uttan fyri frítíðarskeiðið, tó seinast 1. mai árið eftir."

5) § 10. stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Arbeiðsgevarin veitir løntakaranum frítíðarløn, ið er 12% av vunnari løn."

6) Í § 11. stk. 1. 2. punktum verður "0,75%" broytt til: "1,5%".

7) § 2 í løgtingslóg nr. 70 frá 2. apríl 1993 fer úr gildi.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir kunngerð.

Viðmerkingar:

Sum kunnugt var í 1986 sett í gildi nýggj frítíðarlóg, sum ásetti, at frídagatalið í innvinningarárinum 1988/89 skuldi verða 30 dagar.

Somuleiðis varð ásett, at frítíðarlønin frá sama innvinningarári at rokna skuldi verða 12% av alkari útgoldnari løn.

Í 1993 vóru skerjingar gjørdar í rattindunum hjá løntakarunum soleiðis, at frítíðin varð sett niður í 26 dagar fyri fulla starvstíð, og frítíðarlønin varð sett niður í 10,25% av vunnari løn og hjá mánaðarløntum var frítíðarískoytið lækkað til 0,75% av vunnari løn í undanfarna innvinningarári.

Framman undan vóru broytingar gjørdar í lógini um arbeiðsloysisskipanina soleiðis, at arbeiðsgevararnir og løntakararnir skulu gjalda eitt størri gjald til hesa skipan, enn teir áður høvdu gjørt.

Tá frítíðarlógin var broytt í 1993, førdi hetta, umframt at frítíðardagatalið var minkað eisini, við sær, at løntakarin misti ein munandi part av frítíðarløn sínari, samstundis sum arbeiðsgevararnir í sambandi við lógarbroytingina fingu munandi sparingar.

Samanberi vil broytingarnar í lógini um arbeiðsloysisskipanina og broytingarnar í frítíðarlógini, síggja vit soleiðis, sum fleiri fakfeløg eisini hava víst á, at í veruleikanum hava løntakararnir borið allar eykaútreiðslur í sambandi við hækkingina í gjøldunum til arbeiðsloysisskipanina, og sostatt er ikki tann javnvág í, sum lóggávuvaldið vísti á í sambandi við broytingarnar í lógini um arbeiðsloysisskipanina.

Vanligt løntakarin, sum frammanundan hevur sera ilt við at klára fíggjarligu skyldur sín at, er her fyri stórum vanbýti, og tí verður mælt til, at frítíðarlógin verður broytt soleiðis, at løntakarin aftur fær 30 dagar frítíð um árið, og tímalønti løntakarin samstundis aftur kemur at fáa 12% av vunnari løn í frítíðarløn.

Vístverður eisini í hesum sambandi á, at tey alment løntu í sambandi við seinastu sáttmálasamráðingar hava fingið aftur nakað av tí lønarmissi, sum tey beinleiðis ella óbeinleiðis vóru fyri í sambandi við samráðingarnar í 1992/93.

Tað er tí náttúrligt, at tey tímalønta eisini fáa aftur ta frítíðarløn, sum tey høvdu rætt til áðrenn lógarbroytingina í 1993.

Vónandi taka politisku flokkarnar á tingi undir við hesum uppskoti, sum samsvarar við tey úttalilsi, sum landsstýrið er komið við um, at bøtt eigur at verða um fíggjarligu korini hjá vanliga føroyringinum.

Fíggjarligar avleiðingar av lógaruppskotinum.
Fyri arbeiðsgevaran fer lógaruppskotið at føru við sær ávísa øking í lønarútreiðslunum, nú frítíðarlønin eftir uppskotinum skal hækka úr 10,25% upp í 12% og úr 0,75% til 1,5% hjá mánaðarløntum.

Lætt er at rokna hesar økingar, men viðmerkjast skal, at tá talið á tímalønta arbeiðsfólki innan fyri tað almenna ikki er stórt, verða avleiðingarnar fyri landskassan í sambandi við lógarbroytingina ikki stórar.

Eisini eigur her at verða hugsað um, at á fleiri almennum stovnum, t.d. hjá landsverkfrøðinginum, hafda øll tey tímalønta frí í senn.

Vit skulu eisini her hava í huga tær eyka skattainntøkur, sum ein øking í frítíðarpeningunum gevur fyri landskassan.

Viðvíkjandi teimum fastløntu skal í hesum sambandi nevnast tað positiva árin, sum er fylgjan av, at t.d. arbeiðsleys kunnu starvast sum avloysarar, meðan tey fastløntu halda frí.

Uppskotsstillararnir eru vanligir við ta semju, sum nøkur av arbeiðstakarafeløgum teirra alment løntu hava gjørt við Føroya Landsstýri í 1995. Sbrt. semjuni hava limir í hesum feløgum rætt til 2 frídagar eyka í álmanakkaárinum 1995 og 1 eyka frídag afturat í álmanakkaárinum 1996 og frameftir, tó at henda frítíð ikki gevur rætt til frítíðarískoyti.

Hóast hetta halda uppskotsstillararnir tað vera rettast, at lógin - t.v.s. frítíðarlógin - sum heild ásetir, hvørji rættindi allir arbeiðstakarar í landinum skulu hava á hesum týðningarmikla øki. Mælt verður tí til, at partarnir endurskoða nevndu semju hesum viðvíkjandi, vísandi til at frítíðarlógin, sambæri hesum uppskoti verður galdandi, sum hon var frammanundan, lógarbroytingini í 1993 og frammanundan, at nevnda semja varð gjørd.

1. viðgerð 26. mars 1996. Málið varð beint í trivnaðarnevndina, sum 7. mai 1996 legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av løgtingsmonnunum Jenis av Rana og Ingeborg Vinther tann 13. mars 1996 og varð eftir 1. viðgerð 26. mars 1996 beint í trivnaðarnevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini havt fund við umboð fyri arbeiðarafeløgini og umboð fyri Føroya

Arbeiðsgevarafelag.

Umboðini fyri arbeiðarafeløgini førdu fram, at tøka reallønin hjá teirra løntakarum var minkað við 23% í tíðarskeiðinum 1991 - 1995, umfram at løgtingið við lóg í 1993 skerdi frítíðarskeiðið og lønina.

Umboðini vístu á, at tíðin nú var komin til at broyta lógina til tað, ið var galdandi undan skerjingini í 1993.

Somuleiðis førdu umboðini fram, at um løgtingið samtykti uppskotið, fór tað at hava ávirkan á lønarkrøvini til sáttmálasamráðingarnar.

Umboðini fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag førdu fram, at uppskotið um tað verður samtykt, kemur at kosta privatu arbeiðsgevarunum eina 35 mió. krónur og at peningurin í staðin átti at verið nýttur til konsolidering, útvegan av meiri rávøru og nýggj arbeiðspláss. Eisini søgdu umboðini, at vinnan kom at fáa munandi eyka útreiðslur vegna økt ES krøv.

Nevndin hevur frá fíggjar- og búskapardeildini í Tinganesi fingið meting av hvussu nógv samlaðu løntarútreiðslurnar hjá tí almenna økjast, um uppskotið verður samtykt. Deildin metir, at netto útreiðslan á fíggjarlógini árliga verður 10 mió. kr.

Nevndin hevur býtt seg í fýra minnilutar.

Minnilutin (Kristian Magnussen og Sverre Midjord) tekur undir við uppskotinum og førir fram, at stórur partur av vinnuni á sjógvi og landi er saneraður upp til fleiri ferðir og hevur lønmóttakarin rindað stórran part av saneringunum yvir skattin, somuleiðis er produktiviteturin í framleiðsluvinnuni nú øktur seinastu árini, uttan at lønmóttakararnir hava merkt stórvegis bata í fíggjarligu korunum, skattalettin í ár undantikin.

Við at hækka frítíðarlønarprosentið og frídagarar verður eisini bøtt um trivnaðin hjá lønmóttakarunum og familjum teirra.

Løgtingið eigur eisini at hava í huga, at lógin blejv broytt í 1993 til fyrimuns fyri arbeiðsgevararnar.

Mett verður, at skatturin av øktu útreiðslunum hjá privatu arbeiðsgevarunum fíggjar økta útreiðslurnar hjá landskassanum.

Minnilutin (Lisbeth L. Petersen og Maria Hansen) tekur ikki undir við uppskotinum.

Støðan hjá vinnuni er lítið batnað síðan 1993. Tíðin er tí ikki komin til at hækka frítíðarprosentið. Um útreiðslurnar hjá útflutningsvirkjunum økjast, verða vit minni kappingarfør, og kemur betta at geva eitt størri arbeiðsloysi.

Minnilutin (Jørgen Niclasen og Óli Breckmann) førir fram, at reallønin er ov lág, tí skattur og kostnaðarstøði eru ov høg og eta bruttolønina upp. Men tað er skeivt politiskt at bróta inn á arbeiðsmarknaðin, sum tá landsstýrið í fjør gjørdi mismun millum vinnulønt og almennt lønt og aftur setti ferð á ta óndu ringrásina við hækkandi kostnaðarstøði, fleiri studningum og frádráttum, men við sonu alt ov lágu útgoldnu løn.

Hevði løgtingið samtykt broytingaruppskot fólkaflokksins til verandi fíggjarlóg, fingu tínalønt 7.000 kr. størri skattalætta, enn uppskot landsstýrisins gav, og 3 ferðir meiri enn uppskotið hjá Ingeborg Vinther og Jenis av Rana. So loystí seg betur at arbeiða og forvinna meir, at spara saman og geru fløgur í nýggj arbeiðspláss.

Uppskotið frá Ingeborg Vinther og Jenis av Rana kostar umr. 35 mió. kr. Tað merkir fleiri enn 250 nist

arbeiðspláss og sendir meiri óvirkaðan fisk av landinum, av tí at kappingarføríð og lønsemið hjá vinnuni er so vánaligt.
Heldur samtykkja uppskot fólkafloksins um "Føroyar sum lágskattaland" ella uppskotið "Sjálvuppgávan á postkorti", ið hevði givið tímalønum uml. 25.000 kr. meiri í útgoldnari løn. Tað er 10 ferðir meira enn tær 2.500 kr., sum uppskotið hjá Ingeborg Vinther og Jenis av Rana hevði givið.

Alternativt mælir minnilutin til, at løgtingið til komandi fíggjarlóg samtykkir sama netto skattalætta, sum Fólkaflokkurin skjeyt upp fyri í ár, men sum løgtingið tá feldi.

Minnilutin (Lasse Klein) tekur støðu í tingsalinum, men hevur annars hesar viðmerkingar:

Tað kundi verið áhugavert hjá Føroya Løgtingi og Føroya fólki at fingið eina frágreiðing frá landsstýrissamgonguni, um hvønn fíggjar- og búskaparpolitikk hon ætlar sær at reka í framtíðini, nú stórar avbjóðingar standa fyri frammun hjá føroyska tjóðini, og hvørja støðu teir einstøku samgonguflokkarnir hava til hendan spurning.

Orsøkin til hendan spurning er eisini tann, at Hin Føroyski Javnaðarflokkurin so at siga gav leyst á landsfundi sínum herfyri, og 1. mai 1996 gav umboð javnaðarfloksins púra leyst á øllum fíggjar- og búskaparøkinum, sum flokkurin sjálvur umsitur í samgongu.

Áður hava samgonguflokkarnir bygt sína stevnu á eitt samgonguskjal, og tí kann tað fáa týdning fyri arbeiðsgongdina á tingi at fáa at vita hvørjar ætlanir samgongan hevur fyri framtíðina, soleiðis at aðrir flokkar í andstøðu/samgongu fáa møguleika at skipa sítt politiska arbeiði eftir hesum stevnumiðum.

2. viðgerð 9. mai 1996. Samtykt við 21-0-7 atkvøðum at beina málið til 3. viðgerð.

3. viðgerð 10. mai 1996. Málið endaligu samtykt við 22-0-6 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 75, 20. mai 1996.

58 Fólkatrygging

Ár 1996, týsdagin 19. mars legði Óli Breckmann vegna fólkaflokkin fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um avlanis-, lívs- og eftirlønartrygging, frádragin í skattinum.

§ 1. Stovnað verður ein fólkatrygging, ein avlanis-, lívs- og eftirlønarskipan, sum umfatar allar føroyingar í vinnu og teirra avvarðandi.

§ 2. Tryggingargjaldið, -bónus og -útgjaldið eru persónlig ogn hjá tí tryggjaða.

§ 3. Skipanin verður uppbygd í trimmu stigum:
Stig 1: Aldurseftirlønin verður sett í verk 01.01.1997, tá ella tá ein fylla 67 ár.
Stig 2: Veiting við deyða verður sett í verk 01.01.2000.
Stig 3: Veiting við óarbeiðsføri verður sett í verk 01.01.2003.

§ 4. Løgtingið setir straks 5-manna arbeiðsbólk av tryggingarkønnum til at fyrireika fylgilógir til hesa rammulóg.

§ 5. Inngjald:

1% av útgoldnari løn í 1997
2% av útgoldnari løn í 1998
3% av útgoldnari løn í 1999
4% av útgoldnari løn í 2000
5% av útgoldnari løn í 2001
6% av útgoldnari løn í 2002

§ 6. Inngjaldið til Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin fellur burtur, tá inngjaldið til Fólkatryggingina kemur upp á 6%.

§ 7. Útgjald við 67 ára eftirlønaraldur:
Pr. 01.01.1997 kr. 5.000,- um mánaðan (+ príst. viðbøtur)
Pr. 01.01.2004 kr. 7.000,- um mánaðan (+ príst. viðbøtur)
Pr. 01.01.2011 kr. 9.000,- um mánaðan (+ príst. viðbøtur).

§ 8. Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin saman við núverandi avsetingum á løgtingsfíggjarlógini til almenna fólkapensjón verður brúktur til at hækka verandi fólkapensjón upp til tær í § 7 nevndu upphæddir, til fólkatryggingin so hvørt megnar at útgjalda øllum tryggingareigarum í minsta lagi nevndu veitingar.

§ 9. Teir persónar, sum grundað á aldur, innøkumøguleikar ella óvinnuføri ikki náa besar upphæddir yvir fólkatryggingina, fáa maniu útgoldnan frá landskassanum.

§ 10. Henda lóg um fólkatrygging ávirkar ikki onnur persónlig tryggingarviðurskifti hjá einstaklingum ella feløgum.

§ 11. 5-manna arbeiðsbólkurin skal lata løgtinginum álit um stig 1, eftirlønartryggingina, og um bráðneyðugar tillagingar og reglugerðir í seinasta lagi 1. okt. 1996, um stig 2, lívstrygging, (veiting við óvæntaðan deyða), og um stig 3, avlamistrygging (útgjald við óarbeiðsføri) í seinasta lagi 1. jan. 1997.

§ 12. Tryggingargjaldið verður flutt um afturhaldsskipanina til tryggingarkonto hins einstakra tryggingartakarans.

§ 13. Skattligi frádrátturin fyri tryggingargjald og útgjald verður samsvarandi reglunum í galdandi rentutryggingarlóg.

§ 14. Henda lóg fær gildi dagin eftir kunngerð.

Viðmerkingar:

Søguliga gongdin
Tá núgaldandi lógir um fólka- o.a. almennar pensiónir vórðu settar í gildi fyri mansaldri síðan, vóru tær mettar framstig og hitt evsta, sum táverandi búskaparorka loyvdi. Tá lá miðallivialdurin hjá fólki nærum ájavnt við pensiónsaldurin, men er síðan hækkaður, so at bæði kvinnur og menn liva eini 8-10 ár longur nú enn tá. Altso er talið á pensionistum nógv økt, og áramálið, sum hitt almenna rindar pensión, fleirifaldað.

Samstundis er tilgongdin av ungfólki hitfalsliga fallin. Tá vóru eini 10 fólk í vinnuførum aldri fyri hvønn pensiónist. Í dag eru bert 4 vinnufør til at fíggja kostnaðin av aldurdóminum. Framskrivingar í fólkamynstrinum vísa, at longu um 20 ár verða bert 3 vinnufør fyri hvønn pensiónist. Tá er ikki lagt upp fyri, at barnatalið í Føroyum enn er høgt og fer kanska at lækka sum í grannalondunum.

Galdandi lógir og trupulleikar
Uppskotsstillarin gjørdi longu seinna part av 70-árunum bæði á tingi og í fjølmiðlunum vart við, at neyðugt var sum skjótast at broyta verandi fólka- og avlamispensión frá eini kollektivari veitingarskipan til eina persónliga tryggingarskipan við rentutilskriving, galdandi fyri allar borgarar.

Men kollektivistiski tíðarandin fordømdi tá við rakstrarrópinum "trælanípuprinsippið" ávaringar uppskotstillarans móti eitt nú at byggja ovurdýrar almennar stovnar eftir donskum mynstri. Danski okursprísurin pr. stovnsfermetur, pr. búfólk og/ella starvsfólk fór at útiloka fjøld av komandi gomlum frá yvirhøvur at fáa neyðuga røkt. (Spádómurin hevur síðan víst seg at vera beinur).

Sami kollektivistiski tíðarandi, sum er "samhaldsfesti" heldur enn persónlig ábyrgd av egnum aldurdómi, hevur higartil forðað fyri, at ein fólkatrygging er vorðin veruleiki. Fólkapensjónin verður játtað á fíggjarlógini fyri hvørt ár sær eftir talinum á pensjónistum yvir 67 ár. Við færri skattgjaldarum sammett við talið

á gomlum viknar orkan at fíggja fólkapensjónina. Tí livir fjøldin av føroyskum pensjónistum í dag undir óalmenna lungursmarkinum. Almennu pensjónslógirnar eru vorðnar ein stór lløkja.

ALS er eitt dømi um politiskt spilta almannaskipan: Hon er ikki persónlig, men kollektiv og verður tí trároynd (sum ein fiskiveiðiskipan við felagskvotum ella handilskvotum av felags fiskastovnum), og ALS varð sett í verk, eftir at arbeiðsloysið var farið at gera um seg.

Tó hevur bragdað onkustaðni: Einstaklingar og fleiri yrkisfeløg hava seinnu árini stovnað pensjónskipanir, sum nú umfata ein í 6-7.000 fólk í Føroyum.

Men teir føroyingar, fjøldin av verkafólki, sjómonnum, handverkarum og lontakarar í tænastuvinnuni, sum hava sett sítt álit á tað kollektivu trygdina, kenna seg sviknan og hava enn bert tær kørgu almennu pensjónskipanirnar at líta á. Samhaldsfesti kann bert verða eitt eiti og ein táta.

Tí er bráðneyðugt, at teir enn ótryggjaðu uml. 10.000 føroyingar í vinnu og teirra avvarðandi sleppa at skapa trygd um sín aldurdóm og móti óvæntaðum deyða og avlamni, sum bert ein persónlig fólkatrygging við rentuætilskriving kann veita.

Lóggávan í grannalondum

Fleiri vestanlon hava nú ásannað, at fjøldin gránar og tekur grundarlagið undan beinleiðis veitingarskipanini frá skattgjaldara til pensjónist uttan rentutilskriving. Almenn og samhaldsføst pensjónskipan er enntá vorðin ein bóttan móti trygdini ikki bert hjá teim gomlu, men móti vellerð og búskapi. Tí eru fleiri lond langt áleiðis komin við alternativum eftirlønar-, avlamis- o.ø. sosialum skipanum eftir tryggingarregluni við lívlangari rentutilskriving.

Fíggjarligar avleiðingar av uppskotinum

Fyri tann einstaka føroyingin fær uppskotið ta avleiðing, at fólkapensjónin lækkar 1.000 kr. mánaðarliga úr verandi 4.300 upp í 5.300 kr. longu frá komandi 1. januar '97. Síðan hækkar pensjónin aftur í ár 2004 upp í 7.000 kr. mánaðarliga í dagsprísum (8.600 kr., um prísvøksturin verður t.d. 3% p.a.). Endaliga kemur pensjónin í 2011 upp í 9.000 kr. mánaðarliga (13.600 kr. við 3% í prísvøkstri).

Fyri landskassan fær Fólkatryggingin ta avleiðing, at játtanin á fíggjarlógini til verandi fólkapensjón økist ikki meiri, men kemur í hæddina á verandi støði upp á uml. 250 mio. kr. Men longu í ár 2005 er bert neyðugt at avseta uml. 150 mió. kr. á fíggjarlógina, og ár 2011, tá fólkatryggingin virkar fullut, verður bert neyðugt at játta 60-70 mió. kr. á fíggjarlógini til fólkapensjón.

Her verður talan um uml. 200 mió. kr. árlig sparing.

Sama verður galdandi fyri játtanina á fíggjarlógini til almennu avlamispensjónskipanina: Hon lækkar úr verandi 120 mió. kr. niður í 1/4 av verandi játtan, tá fólkatryggingin eisini umfatar hana. Men Lívstryggingin sum partur av fólkatryggingini fær ikki ávirkan á fíggjarlógina, tí verandi almannaskipan umfatar ikki lívstrygging við óvæntaðan deyða.

Her verða eisini uml. 100 mió. kr. spardar árliga.

Landskassin fer at missa skattainntøkuna av tí, sum í staðin verður spart saman árliga í fólkatryggingina. Men av tí at inngjaldið bert økist líðandi, úr 1% árliga í 1997 upp í 6% árliga í 2002, verður lættari hjá tí almenna at laga seg til inntøkumissin, sum eisini skjótt verður uppvigaður av teinum avleiddu inntøkum, sum stava frá fløguvirksemi og nýggjum arbeiðsplássum frá samanspardu upphæddini.

Um Føroyar varðveita verandi skattaskipan (sum eitt tó ikki má vónast), fær hitt almenna nakað aftur í inntøku frá pensjónsskatti, tá fólkatryggingin rindar fútt útgjald.

Serliga positiva ávirkan fær fólkatryggingin fyri landskassan við teirri útreiðsluminking, sum stendst av, at játtanin til fólkapensjónina í 2005 verður uml. 125 mió. kr. lægri árliga enn nú, og í 2011 verður uml. 200 mió. kr. lægri árliga enn nú.

Ávirkanin, sum fólkatryggingin fær á Samhaldsfasta (stovnsfe við árslok í ár 155 mió. kr.) er, at hann verður brúktur í eini skiftisskipan til at gjalda ískoytið til ta hækkaðu fólkapensjónina longu frá 1. jan. 1997. Í 2004 fellur hesin grunnur burtur, tí hann tá hevur tænt sínum avmarkaða endamáli og er gjørdur óneyðugur av fólkatryggingini.

Avleiðingar á umsjónina
Fólkatryggingin hevði lítið og einki kostað eyka hjá t.d. Føroya Lívstrygging at umsitið annað enn sum framhald av teimum 6-7.000 frammanundan tryggjaðu hjá hesum stovni.

Fólkatryggingin hevði gjørt tað lættari hjá Almannastovuni, sum við tíðini hevði sloppið undan at umsitið 3/4 av verandi játtan til fólkapensjónina. Seinni hevði eisini fyrisitingin av almennu avlamistryggingini í sama mun minkað. Talan hevði sostatt verið um stóra sparing - ikki bert 75% minni játtan, men eisini minni fyrisiting.

Viðmerkingar til einstøku greinarnar

Ad § 1: Av tí at uml. 7.000 føroyingar longu hava teknað pensjóns-, lívs- og avlamistrygging, kemur henda lóg um fólkatrygging í royndi og veru at umfata uml. 10.000 fólk í vinnu, sum enn ikki eru tryggjað, og teirra avvarðandi, eitt nú heimaarbeiðandi húsmøðirin.

Teir persónar, sum grundað á aldur, skerdar inntøkumøguleikar ella óvinnuføri ikki eru vanligir løntakarar, fáa mutin á verandi veiting og hægru tryggingarútgjald goldnan av landskassanum. Her kann talan vera um eini 20-25% av fólkinum í vinnuførum aldri, sum almenna skipanin og fíggjarorkan kunnu konsentrera seg um og tí dugna betur enn nú.

Tað skal tó altíð loysa seg hjá øllum at vera fólkatryggjað.

Ad § 2: Fyrimunur við, at fólkatryggingin er persónlig ogn hjá tryggingartakaranum, eru fleiri: Eitt nú kann hvør einstakur sjálvur gera av, hvør samanseting av pensjóns-, avlamis- og lívstrygging hóskar best til við komandi og avvarðandi. Eisini elvir ognarrættarin til kenslu av persónligari skyldu móti egnum tryggum aldurdómi og eggjar til eginábyrgd av lívlangari og managóðari sparing.

Persónlig ábyrgd og ogn av egnari trygging virkar forðandi fyri, at bitt almenna órógvar samfelagsgongdina við títtari uppflegging í privatu langtíðarætlanirnar hjá fólki.

Ad § 3: Mælt verður til trý stig, tí búskaparstøðan er so spent í løtuni, at tað er fíggjarliga meiri yvirskoðilígt at byrja í smáum, fyrst við pensjónstrygging, so vit fáa tíð at byggja stovnsfeið hjá fólkatryggingini upp, so fíggjarorkan í skipanini skjótast tilber kann spennast fyri eina líknandi altfevnandi lívs- og avlamistrygging.

Men umráðandi er, at tann nú alt ov lága fólkapensjónin verður hækkað straks, í uppskotinum 1.000 kr. mánaðarliga frá 1. januar komandi, og frægasta nýtsla av Samhaldsfasta hevði júst verið til hesa skiftisskipan.

Ad § 4: Neyðugt er við fleiri tekniskt krevjandi fylgitógum og reglum til at samskipa almannaverkið og fólkatryggingina.

Ad § 5: Líðandi vøkstur í inngjøldum yvir afturhaddskipanina av øllum lønum hevði givið løgtingi og landsstýri skotsbráð til at innretta fíggjarpolitikkin eftir teirri minni upphædd til landskassan, sum svarar til inngjaldið í fólkatryggingina.

Ad § 6: Av tí at inngjaldið til Samhaldsfasta virkar sum hert skattatrýst, uttan at henda kollektiva sparing virkar nær námind so vel sum ein lívlong persónlig sparing við tryggingarrentu, er rættast at leggja Samhaldsfasta niður, tá hann hevur tænt sínum endamáli í eini skiftisskipan.

Ad § 7: Tær pensjónsuppbæddir, sum fólkatryggingin eftir hesum uppskoti miðar eftir, eiga at verða lógarásettar í dagsprísum, so fólk vita, hvat tey í keypsvirði kunnu væntu sær at fáa útgoldið. Men líka umráðandi er at lógarfesta, at fólkatryggingin kraftar at veita trygd fyri prístalshækking av útgoldnu pensjónum frameftir.

Ad § 9: Besti máti at tryggja teim ófullføru, teim inntøkuveiku og tilárskomnu (tá fólkatryggingin fer at virka) eina munadygga pensjónsinntøku, sum liggur væl oman fyri verandi almennu veitingar, er at lata tey arbeiðsføru, inntøkusterku og ungu spara saman til sín egna aldurdóm við rentutilskriving. Bert á tann hátt savna við ta neyðugu almennu fíggjarorkuna til at hjálpa teim veruliga treingjandi eina mannsømiliga tilveru.

Ad § 10: Eyðvitað fær ein lógarbundin fólkatrygging ávirkan á, hvussu teir frammanundan tryggjaðu borgararnir innrætta sína trygging. Men fólkatryggingin er ætlað at vera eitt minstamark fyri, hvussu føroyingar verða tryggjaðir í aldurdómi, við óvæntaðan deyða og avlamni. Fólkatryggingin má tó ikki forða einstaklingum, yrkisbólkum og fakfeløgum í at tekna eftir sínum tykki enn betri tryggingar.

Ad § 11: Við at geva 5-manna serkøna arbeiðsbólkinum ein bundnan og samanhangandi arbeiðssetning, fer fólkatryggingin at virka so væl, so umfatandi og so tíðliga, sum samansparingin eftir hesum uppskoti ger tað møguligt.

Ad § 12: Føroyingar flestir rinda nú fleiri ferðir so nógv í skatti, sum inngjaldið verður til hesa fólkatrygging. Sostatt her henda lóg bert við sær, at ein lítil partur av skattinum í staðin verður fluttur á lívlanga samansparing hjá tí einstaka skattgjaldaranum, sum so ikki merkir inngjaldið tyngja. Skattafría inngjaldið kemur landsbúskapinum tilgóða seinni sum skattskyldug inntøka og privatnýtsla.

Ad § 13: Verandi almenna pensjóns- og avlamisskipan gevur ikki fólki við lágari og/ella skiftandi inntøku somu møguleikar at tryggja sær aldurdómin, sum fólk við hægri og fastari inntøku longu hava við privatum ella samlagstryggingum. Tað er serliga tey alment vælløntu fakfeløgini, sum hava teknað sínum limum tryggingar. Fjøldin av føroyingum hevur latið sær henda mannamun lynda í nógv ár, meðan tey til fánýtis hava bíðað eftir, at politikarar skuldu høta teimum sosialu trygdina.

Men fólkatryggingin hevði givið øllum borgarum uttan mun til inntøku inntøku sama rætt til at tryggja seg móti avlamni, óvæntaðum deyða og at tryggja sær eina munagóða eftirløn.

Ad § 14: Í ein mansaldur hava føroyingar livað undir verandi ónøktandi almennu fólka- og avlamisskipan. Nú má stundin vera komin, at løgtingsmenn taka seg saman at tryggja øllum føroyingum, at Føroyar verða eitt gott land at eldast í.

Víst verður annars til uppskot Fólkafloksins, tingmál nr. 128 um Fólkatrygging, sum Løgtingsins Almanna og heilsunevnd 23. mai 1995 beindi í landsstýrið, haðan einki er frætt.

1. viðgerð 28. mars 1996. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 8. mai 1996 legði fram soljóðandi

Álit

í

løgtingsmáli nr. 58/1995: Fólkatrygging.

Málið er lagt fram av Fólkaflokkinum tann 19. mars 1996 og eftir 1. viðgerð 28. mars 1996 beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur eisini kallað inn umboð fyri Føroya Lívstrygging til fundar í nevndini. Tummas Eliassett, fíggjarstjóri á Føroya Lívstrygging, hevur greitt nevndini frá, at hetta uppskotið ber brá av eini arbeiðsmarknaðarpensjón, og at um ein slík skipan skal hava eitt veruligt tryggingar- og pensjónselement í sær, er neyðugt, at inngjaldið verður í minsta lagi 6% fyri hvønn persón. Hann nevndi, at honum kunnugt hava bert Australia og New Zealand tryggingarskipanir, sum líkjast teirri skipan, sum

ásett verður í hesum lógaruppskoti. Hann heldur, at tørvur er á at viðgera spurningin um pensjónsskipanir, men spurningurin er tó, hvussu framtíðarpensjónsskipanir skulu verða. Upplýst varð eisini, at tað longu nú er stórur munur á pensjónistunum, við tað at tey, sum hava verið á privata arbeiðsmarknaðinum, ofta ikki hava annað enn vanliga fólkapensjón, tá tey fara frá fyri aldur.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein **meiriluta** og ein **minniluta.**

Meirilutin (Bjørn á Heygum, Sune Jacobsen, Marita Petersen, Ingeborg Vintber og Signar á Brúnni)kann ikki taka undir við uppskotinum grundað á, at spurningurin um eina framtíðarpensjónsskipan, umframt fíggjarligu avleiðingarnar av eini slíkari skipan enn ikki tykist at vera nóg væl lýstur.

Meirilutin kann tískil ikki loka undir við uppskoti fólkafloksins og setur onki uppskot fram.

Meirlutin ásannar tó, at tað er umráðandi, at spurningurin um framtíðarpensjónsskipanir í Føroyum verður viðgjørdur nærri. Tað er nevniliga ein sannroynd, at tað almenna undir núverandi skipan ikki kann fíggja pensjónirnar í framtíðini, orsakað av at lutfalsliga so nógv fólk gerast eldri.

Meirilutin heitir við hesum á landsstýrið um at leggja fyri tingið frágreiðing í komandi tingsetu, har allir spurningar viðvíkjandi framtíðar pensjónsviðurskiftum í Føroyum verða viðgjørdir.

Minnilutl (Jógvan á Lakjuni og Lasse Klein) tekur undir við uppskoti fólkafloksins, og mælir tinginum at samtykkja tað.

2. viðgerð 10 mai 1996. Uppskotið fekk 6-0-13 atkvøður og fall.

59 Løgtingslóg um líkskoðan, líkuppskurð og vevnaðarflutning v.m.

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Axel Nolsøe, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

ríkislógartilmæli.

Hennara hátign drotningini verður mælt til, við heitnild í § 22 í lóg nr. 402 frá 13. juni 1990 at seta lógina í gildi fyri Føroyar við hesum orðaljóði:

Lóg um líkskoðan, líkuppskurð og vevnaðarflutning v.m.

Kapittul 1
Staðfesting av deyðanum.

§ 1. At persónur er deyður kann staðfestast
1) við óbøtiligum steðgi av andadrátti og hjartavirksemi ella
2) við óbøtiligum steðgi av øllum heilavirksemi.

§ 2. Heilsustýrið ásetur reglur um tær kanningar, ið gerast skulu fyri at staðfesta deyðans komu eftir § 1, nr. 2.

Det indstilles til hendes majestæt dronningen, med hjemmel i § 22 i lov nr. 402 af 13. juni 1990 at sætte loven i kraft for Færøerne i følgende skikkelse:

Lov om ligsyn, obduktion og transplantation m.v.

Kapitel 1
Dødens konstatering.

§ 1. En persons død kan konstateres
1) ved uopretteligt ophør af åndedræt og hjertevirksomhed eller
2) ved uopretteligt ophør af al hjernefunktion.

§ 2. Sundhedsstyrelsen fastsætter bestemmelser om de undersøgelser, der skal foretages for at konstatere dødens indtræden efter § 1, nr. 2.

Kapittul 2
Líkskoðan v.m.

Líkskoðan

§ 3. Líkskoðan verður gjørd av læknum til at avgera, um deyðin er komin. Tá ið líkskoðan verður gjørd, skal ansast eftir deyðsteknum, og deyðsháttur og deyðsorsøk so vítt gjørligt sannast.

Stk. 2. Hendir andlátið meðan ein er innlagdur á sjúkrahúsi ella líknandi stovni, skoðar ein av teimum læknum líkið, ið hevur tikið lut í viðgerðini av sjúklinginum.

Stk. 3. Í øðrum førum skal vanligi læknin hjá tí deyða ella avloysaru hansara skoða líkið. Má í undantaksføri ein annar læknir eftir virðuskiftunum haldast at vera nærri til at skoða líkið, og verður hesin mettur at hava tørvandi grundarlag fyri at taka støðu eisini til deyðsháttur og deyðsorsøk, kann líkskoðanin tó gerast av hesum læknum.

Stk. 4. Eingin læknir á staðnum kann nokta at koma á staðið at gera líkskoðan, um so er, at boðsendingin kemur av, at vanligi læknin og avloysari hansar hava gyldugt forfall, ella at tann deyði ikki hevur nakran vanligan læknir á deyðsstaðnum.

Fráboðan til løgregluna

§ 4. Læknin, ið verður fráboðaður í samband við andlát, skal senda løgregluni fráboðan:

1) tá ið deyðin er orsakaður av revsiverdari gerð, sjálvmorði ella vanlukkutilburði,
2) tá ið persónur verður funnin deyður,
3) tá ið andlátið hendir knappliga og ikki er væntað av læknaligum orsøkum,
4) tá ið orsøk er til at halda, at andlátið kann vera komið av eini vinnusjúku, ið kemur undir lýriskipan nr. 389 frá 15. november 1966 fyri Føroyar um vanlukkutrygging, smbr. kunngerð nr. 32 frá 28. mars 1980,
5) tá ið deyðin kann vera orsakaður av misstaki, vansketni ella óluktuligari hending í sambandi við viðgerð ella fyribyrging av sjúku,
6) tá ið andlátið hendir á stovnum hjá kriminalforsorgini, ella
7) tá ið tað annars ikki við vissu kann útihýsast, at andlátið skyldast revsiverdari gerð, sjálvmorði ella vanlukkutilburði ella at deyðin av øðrari orsøk verður mettur at hava áhuga hjá løgregluni.

Stk. 2. Hendir andlátið á sjúkrahúsi ella líknandi stovni, verður fráboðanin, nevnd í stk. 1, givin av leiðandi læknanum.

Rættarlæknalig líkskoðan

§ 5. Í teimum førum, nevnd eru í § 4, fer rættarlæknalig líkskoðan fram.

Stk. 2. Rættarlæknaligari líkskoðan kann tó slepp-

Kapitel 2
Ligsyn m.v.

Ligsyn

§ 3. Ligsyn foretages af en læge til afgørelse af, om dødsfald er indtrådt. Ved ligsynet skal dødstegn iagttages og dødsmåde og dødsårsag så vidt muligt fastslås.

Stk. 2. Er dødsfald indtrådt under indlæggelse på sygehus eller lignende institution, foretages ligsyn af en af de læger, der her har deltaget i patientens behandling.

Stk. 3. I andre tilfælde skal ligsyn foretages af afdødes sædvanlige læge eller dennes stedfortræder. Må undtagelsesvis en anden læge efter forholdene anses nærmere til at foretage ligsynet, og finder denne at have tilstrækkeligt grundlag for at tage stilling også til dødsmåde og dødsårsag, kan ligsynet dog foretages af denne læge.

Stk. 4. Ingen stedlig læge kan undslå sig for at komme til stede til foretagelse af ligsyn, hvis tilkaldelsen skyldes, at afdødes sædvanlige læge og dennes stedfortræder har gyldigt forfald, eller at afdøde ikke havde nogen sædvanlig læge på dødsstedet.

Indberetning til politiet

§ 4. Den læge, der tilkaldes i anledning af dødsfald, skal afgive indberetning til politiet:

1) når dødsfaldet skyldes et strafbart forhold, selvmord eller ulykkestilfælde,
2) når en person findes død,
3) når døden er indtrådt pludselig og ikke er forudset af lægelige grunde,
4) når der er grund til at antage, at dødsfaldet kan skyldes en erhvervssygdom, der er omfattet af anordning nr. 389 af 15. november 1966 for Færøerne om forsikring mod følger af ulykkestilfælde, jfr. kundgørelse nr. 32 af 28. marts 1980,
5) når døden kan være en følge af fejl, forsømmelse eller ulykkelig hændelse i forbindelse med behandling eller forebyggelse af sygdom,
6) når dødsfald forekommer i Kriminalforsorgens institutioner, eller
7) når det i øvrigt ikke med sikkerhed kan udelukkes, at dødsfaldet skyldes et strafbart forhold, selvmord eller ulykkestilfælde eller dødsfaldet af andre grunde skønnes at kunne have politimæssig interesse.

Stk. 2. Ved dødsfald på sygehus eller lignende institution afgives den indberetning, der er nævnt i stk. 1, af den ledende læge.

Retslægeligt ligsyn

§ 5. I de tilfælde, der er nævnt i § 4, iværksættes retslægeligt ligsyn.

ast undan:

1) fyri andlát ella vanlukkutilburðir, um so er, at deyðin ikki er hendur fyrr enn eina tíð aftaná vanlukkuna, og løgreglen eftir útvegan av upplýsingum heldur tað vera eyðsýnt, at andlátið er uttan áhuga hjá løgregluni,
2) við tey andlát, ið nevnd eru í § 4, stk. 1, nr. 2, 3, 5 og 6, um so er, at tað millum løgregluna og landslæknan er semja um, at útvegaðu upplýsingarnir eyðsýnt vísa, at andlátið er náturligt,
3) við andlát, nevnd eru í § 4, stk. 1, nr. 4, um so er, at landslæknin heldur, at útvegaðu upplýsingarnir við neyðugari vissu hava lýst deyðsorsøkina, og
4) við onnur andlát, ið løgreglan hevur fingið kunnleika til, og verðar mett at kunna hava áhuga fyri løgregluna, um so er, at løgreglan aftaná eina kanning heldur tað vera sannlíkt, at talan er um náturligan deyða.

Stk. 2. Retslægeligt ligsyn kan dog undlades:

1) ved dødsfald efter ulykkestilfælde, såfremt døden først er indtrådt nogen tid efter ulykken og politiet efter de tilvejebragte oplysninger finder det åbenbart, at dødsfaldet er uden politimæssig interesse,
2) ved de dødsfald, der er nævnt i § 4, stk. 1, nr. 2, 3, 5 og 6, såfremt der mellem politiet og landslægen er enighed om, at de tilvejebragte oplysninger gør det åbenbart, at der foreligger naturlig død,
3) ved de dødsfald, der er nævnt i § 4, stk. 1, nr. 4, såfremt embedslægen finder, at de tilvejebragte oplysninger med tilstrækkelig sikkerhed har klarlagt dødsårsagen, og
4) ved andre dødsfald, der er kommet til politiets kundskab og er antaget at kunne have politimæssig interesse, såfremt politiet efter en undersøgelse finder det åbenbart, at der er tale om naturlig død.

§ 6. Rættarlæknalig líkskoðan verður gjørd av løgregluni og landslæknanum í felag.

Stk. 2. Løgmálaráðharrin kann aftaná umrunali frá Heilsustýrinum veita øðrum læknum loyvi til at taka lut í rættarlæknaligari líkskoðan fyri landslæknan. Í átrokandi førum kann ein av landfútanum tilnevndur lækni luttaka.

§ 6. Retslægeligt ligsyn foretages af politiet og landslægen i forening.

Stk. 2. Justitsministeren kan efter indhentet erklæring fra Sundhedsstyrelsen meddele andre læger tilladelse til at deltage i retslægeligt ligsyn i landslægens sted. I påtrængende tilfælde kan en af politimesteren udpeget læge deltage.

Deyðsváttanir

§ 7. Tá ið líkskoðan er lokin, skal læknin geva deyðsváttan. Er andlátið fráboðað løgregluni eftir § 4, má deyðsváttan bara gevast, um løgreglan sigur frá, at fráboðanin ikki gevur høvi til rættarlæknaliga líkskoðan. Er rættarlæknalig líkskoðan farin fram, verður deyðsváttanin givin av tí lækna, ið hevur luttikið í líkskoðanini.

Stk. 2. Líkið má ikki jarðast, brennast ella flytast av landinum, fyrr enn deyðsváttan er givin. Er deyðsváttanin givin aftaná rættarlæknaliga líkskoðan, skal váttan haralturat hava árit frá løgregluni um, at einki forðar fyri, at líkið verður jarðað, brent ella flutt av landinum.

Dødsattest

§ 7. Når ligsyn er afsluttet, skal lægen udstede dødsattest. Er dødsfaldet indberettet til politiet efter § 4, må dødsattest kun udstedes, hvis politiet meddeler, at indberetningen ikke giver anledning til retslægeligt ligsyn. Er der foretaget retslægeligt ligsyn, udstedes dødsattesten af den læge, der har deltaget heri.

Stk. 2. Liget må ikke begraves, brændes eller føres ud af landet, førend dødsattest er udstedt. Er dødsattesten udfærdiget efter retslægeligt ligsyn, skal attesten yderligere være forsynet med politiets påtegning om, at intet er til hinder for, at liget begraves, brændes eller føres ud af landet.

Umsorgan fyri líkum

§ 8. Persónur, sum verður hildin at vera deyður, skal liggja undir fullgóðum umstøðum. Er deyðin ikki vissur, skal viðkomandi vera undir jøvnum eftirliti og má ikki koyrast í líkhús, áður enn ein lækni hevur sannað deyðstekin. Áður enn líkskoðan er lokin og deyðsváttan givin, má líkið ikki leggjast í kistu ella flytast til kapell.

Omsorg for lig

§ 8. En person, der antages at være afgået ved døden, skal anbringes under forsvarlige forhold. Er dødens indtræden ikke åbenbar, skal den pågældende være under jævnligt tilsyn og må ikke føres til lighus, før en læge har iagttaget dødstegn. Førend ligsyn er afsluttet og dødsattest er udstedt, må liget ikke anbringes i kiste eller føres til kapel.

Kapittul 3
Líkuppskurður

Rættarlæknaligur líkuppskurður

§ 9. Rættarlæknaligur líkuppskurður skal gerast

1) tá ið andlátið er orsakað av revsiverdum viðurskiftum, ella møguleikin fyri hesum ikki við nóg góðari vissu kann útlýsast ella líkuppskurður tó verður mettur neyðugur fyri at fyribyrgja, at misstankið seinni kann koma fram um betta,
2) tá ið deyðsháttur annars ikki er staðfestur við nóg góðari vissu undir rættarlæknaligu líkskoðanini, ella
3) tá ið deyðsorsøkin ikki er samnað við nóg góðari vissu undir rættarlæknaligu líkskoðanini og fleiri rættarlæknaligar kanningar av løgreglurorsøkum verða mettar neyðugar.

Stk. 2. Verður mett at almennur áhugi annars krevur eina serstaka kanning av deyðsorsøkini til ávísar bólkar av andlátum, kann løgmálaráðið aftaná tingingar við Heilsustýrið avgera, at í sambandi við slík andlát skal rættarlæknaligur líkuppskurður gerast.

§ 10. Avgerð um rættarlæknaligan líkuppskurð verður tikin av løgregluni. Líkuppskurðurin verður gjørdur av einum serkønum lækna, ið verður tilnevndur av løgmálaráðharranum, saman við landslæknanum ella einum øðrum lækna, ið umboðar hann.

Stk. 2. Tala umstøðurnar fyri hesum, skulu næstringar, áðrenn líkuppskurður verður gjørdur, fáa boð um andlátið og um, at líkuppskurður verður gjørdur. Viðkomandi skal samstundis verða kunnaður um møguleikan fyri rættarroynd.

Rættarroynd

§ 11. Seta næstringar seg ímóti rættarlæknaligum líkuppskurði, skal løgreglan innan 24 tímar leggja spurningin fyri rættin, um avgerðin er lóglig.

Stk. 2. Málið verður viðgjørt eftir rættargangsreglum fyri revsimál. Rætturin tekur avgerð við úrskurði. Kærufreistin til landsrættin er 3 dagar. § 949, stk. 2, í rættargangslógini verður nýtt samsvarandi.

Stk. 3. Í teimum í § 9, stk. 1, nevndu førum, kann líkuppskurður gerast, áðrenn rættaravgerð fyriliggur, um so er, at endamálið annars verður mist.

Læknavísindaligur líkuppskurður

§ 12. Líkuppskurður við læknavísindaligum endamáli og í hesum sambandi tøka av vevnaði og øðrum lívfrøðiligum evni kann eftir reglunum í stk. 2-5 gerast á persón, sum er deyður á ella sum deyður

Kapitel 3
Obduktion

Retslægelig obduktion

§ 9. Retslægelig obduktion skal foretages:

1) når dødsfaldet skyldes et strafbart forhold, eller muligheden heraf ikke med tilstrækkelig sikkerhed kan udelukkes eller obduktion dog skønnes nødvendig for at bindre, at der senere kan opstå mistænke herom,
2) når dødsmåden i øvrigt ikke er fastslået med tilstrækkelig sikkerhed ved det retslægelige ligsyn, eller
3) når dødsårsagen ikke er fastslået med tilstrækkelig sikkerhed ved det retslige ligsyn og yderligere retsmedicinske undersøgelser af politimæssige grunde skønnes påkrævet.

Stk. 2. Skønnes almen interesse iøvrigt at kræve en særlig undersøgelse af dødsårsagen ved bestemte grupper af dødsfald, kan justitsministeriet efter forhandling med Sundhedsstyrelsen bestemme, at der ved sådanne dødsfald skal foretages retslægelig obduktion.

§ 10. Bestemmelse om retslægelig obduktion træffes af politiet. Obduktionen udføres af sagkyndig læge, der udpeges af justitsministeren, sammen med landslægen eller dennes stedfortræder.

Stk. 2. Såfremt omstændighederne tillader det, skal afdødes nærmeste, førend obduktion foretages, underrettes om dødsfaldet og om, at der vil blive foretaget obduktion. Den pågældende skal samtidig gøres bekendt med adgangen til domstolsprøvelse.

Domstolsprøvelse

§ 11. Såfremt afdødes nærmeste modsætter sig retslægelig obduktion, skal politiet inden 24 timer indbringe spørgsmålet om lovligheden af beslutningen herom for retten.

Stk. 2. Sagen behandles efter strafferetsplejens regler. Rettens afgørelse træffes ved kendelse. Kære til landsretten kan kun ske inden for en frist på 3 dage. Retsplejelovens § 949, stk. 2, finder tilsvarende anvendelse.

Stk. 3. I de i § 9, stk. 1, nævnte tilfælde kan obduktion foretages, inden rettens afgørelse foreligger, såfremt der er nærliggende fare for, at øjemedet ellers vil forspildes.

Lægevidenskabelig obduktion

§ 12. Obduktion i lægevidenskabeligt øjemed og i forbindelse hermed udtagelse af væv og andet biologisk materiale kan efter reglerne i stk. 2-5 foretages på en person, som er død på eller som død er

er flutur á eitt sjúkrahús ella líknandi stovn.
Stk. 2. Líkuppskurður kann gerast, um so er at hin deyði eftir at hava fylt 18 ár skrivliga hevur givið samtykki til líkuppskurð. Í øðrum føtum má líkuppskurður ikki gerast, um so er at hin deyði ella næstringar hava mælt ímóti hesum ella skurðurin má haldast at stríða ímóti lívsáskoðanini hjá tí deyða ella næstringum, ella um so er at serligar umstøður annars tala ímóti inntrivinum.
Stk. 3. Umfram tey í stk. 2 nevndu føri skulu næstringamir hjá tí deyða, um bústaðurin er kendur, fáa boð um ætlaða líkuppskurðin við áheitan um at geva loyvi til hetta. Líkuppskurðurin kann síðan gerast, um so er at næstringar geva loyvi til inntrivið. Ynskja næstringar ikki at taka støðu til ætlaða líkuppskurðin, skal upplýsast um møguleikan fyri at seta seg ímóti líkuppskurði innan 6 tímar eftir kunningina eftir 1. pkt. Líkuppskurður má í fyrsta lagi gerast 6 tímar eftir hesa kunning, uttan so at næstringar hjá tí deyða frammanundan hava givið samtykki til líkuppskurðin.
Stk. 4. Er hin deyði undir 18 ár, má líkuppskurður bara gerast, um so er, at tann sum hevur foreldramyndugleikan samtykkir í hesum.
Stk. 5. Líkuppskurður má í fyrsta lagi gerast, tá fð líkskoðan hevur verið. Líkuppskurður má ikki vera gjørdur, um so er, at rættarlæknalig líkskoðan ella rættarlæknaligur líkuppskurður skal gerast.

indbragt til et sygehus eller en lignende institution.
Stk. 2. Obduktion må foretages, såfremt afdøde efter sit fyldte 18. år skriftligt har givet sit samtykke til obduktion. I andre tilfælde må obduktion ikke finde sted, såfremt afdøde eller afdødes nærmeste har udtalt sig derimod eller indgrebet må antages at stride mod afdødes eller de nærmeste livsopfattelse, eller såfremt særlige omstændigheder i øvrigt taler mod indgrebet.
Stk. 3. Uden for de i stk. 2 nævnte tilfælde skal afdødes nærmeste, hvis opholdssted kendes, underrettes om den påtænkte obduktion med anmodning om at give tilladelse hertil. Obduktion må herefter foretages, såfremt afdødes nærmeste giver samtykke til indgrebet. Ønsker afdødes nærmeste ikke at tage stilling til det påtænkte indgreb, skal der oplyses om adgangen til at modsætte sig obduktion inden for 6 timer efter underretningen som nævnt i 1. pkt. Obduktion må tidligst foretages 6 timer efter denne underretning, medmindre afdødes nærmeste forinden har givet samtykke til obduktion.
Stk. 4. Er afdøde under 18 år, må obduktion kun foretages, såfremt forældremyndighedens indehaver har samtykket heri.
Stk. 5. Obduktion må først foretages, når ligsyn er foretaget. Obduktion må ikke finde sted, såfremt der skal foretages retslægeligt ligsyn eller retslægelig obduktion.

Kapittul 4
Vevnaðarflutningur

Vevnaðarflutningur frá lívandi persónum
§ 13. Frá persóni, sum hevur givið skrivliga játtan til hetta, kann vevnaður og annað lívfrøðiligt evni takast, meðan persónurin er á lívi til viðgerð av sjúku ella likamsskaða hjá øðrum menniskja.
Stk. 2. Játtan kann gevast av tí, ið hevur fylt 18 ár. Um so er at serligar grundir tala fyri hesum, kann inntrivið tó gerast við játtan frá einum persóni undir 18 ár, tá ið játtanin er góðkend av tí, sum hevur foreldramyndigleikan.
Stk. 3. Áðrenn játtan verður givin, skal viðkomandi hava fingið upplýsingar frá einum læknu um hvussu inntrivið er háttað og fylgjur og vanda av inntrivinum. Læknin skal vissa seg um, at viðkomandi skilir týdningin av givnu upplýsingunum.
Stk. 4. Inntrivið má bara gerast, um so er, at tað eftir sínum hátti og heilsuviðurskiftum hjá játtarannum kann gerast uttan nærliggjandi vanda fyri persónin.

Kapitel 4
Transplantation

Transplantation fra levende personer
§ 13. Fra en person, som har meddelt skriftligt samtykke hertil, kan væv og andet biologisk materiale udtages i personens levende live til behandling af sygdom eller legemsskade hos et andet menneske.
Stk. 2. Samtykke kan meddeles af den, der er fyldt 18 år. Såfremt ganske særlige grunde taler derfor, kan indgrebet dog foretages med samtykke fra en person under 18 år, når samtykket er tiltrådt af forældremyndighedens indehaver.
Stk. 3. Inden samtykke meddeles, skal den pågældende af en læge have modtaget oplysning om indgrebets beskaffenhed og følger samt om risikoen ved indgrebet. Lægen skal forvisse sig om, at den pågældende har forstået betydningen af de meddelte oplysninger.
Stk. 4. Indgrebet må kun finde sted, såfremt det efter sin art og samtykkegiverens helbredstilstand kan foretages uden nærliggende fare for personen.

Vevnaðarflutningur frá deyðum persónum

§ 14. Frá persóni, sum er deyður á ella sum deyður er flutttur á eitt sjúkrahús ella líknandi stovn, kann vevnaður og annað lívfrøðiligt evni takast til viðgerð av sjúku ella líkamsskaða hjá øðrum fólki eftir reglunum í stk. 2-4.

Stk. 2. Inntrivið kann gerast, um so er at hin deyði eftir at vera fyltur 18 ár skrivliga hevur tikið avgerð um hetta. Sama er galdandi, um persónurin munnliga hevur úttalað seg um tílíkt inntriv.

Stk. 3. Uttan fyri tey í stk. 2 nevndu føri má inntriv bara gerast, um so er, at hin deyði ikki hevur givið til kennar mótstøðu ímóti inntrivinum og næstringar hjá tí deyða geva játtan til inntrivið. Hevur hin deyði ongar næstringar, má inntrivið ikki gerast.

Stk. 4. Er hin deyði undir 18 ár, má inntrivið bara gerast, um so er, at tann sum hevur foreldramyndugleikan gevur játtan til inntrivið.

§ 15. Tøka av vevnaði v.m. eftir § 13 og § 14 má bara gerast av læknum, ið eru settir í starv á sjúkrahúsi ella líknandi stovni, og sum Heilsustýrið hevur góðkent til hetta.

Stk. 2. Inntriv eftir § 14 má ikki gerast av teimum læknum, ið hava viðgjørt hin deyða undir hansara seinastu sjúkralegu ella hava sannað, at persónurin er deyður.

Stk. 3. Inntriv eftir § 14 má ikki gerast, um so er, at rættarlæknalig líkskoðan ella rættarlæknaligur líkuppskurður skal gerast, uttan so at inntrivið má haldast at vera uttan týdning fyri úrslitið av kanningini.

Transplantation fra afdøde personer

§ 14. Fra en person, der er død på eller som død er indbragt til et sygehus eller lignende indstitution, kan væv og andet biologisk materiale udtages til behandling af sygdom eller legemsskade hos et andet menneske efter reglerne i stk. 2-4.

Stk. 2. Indgrebet må foretages, såfremt afdøde efter sit fyldte 18. år skriftligt har truffet bestemmelse herom. Det samme gælder, hvis personen mundtligt har udtalt sig for et sådant indgreb.

Stk. 3. Uden for de i stk. 2 nævnte tilfælde må indgrebet kun foretages, såfremt der ikke foreligger nøgen tilkendegivelse fra afdøde imod indgrebet og afdødes nærmeste giver samtykke til indgrebet. Efterlader afdøde sig ingen nærmeste, må indgrebet ikke foretages.

Stk. 4. Er afdøde under 18 år, må indgrebet kun fortages, såfremt forældremyndighedens indehaver har givet samtykke til indgrebet.

§ 15. Udtagelse av væv m.v. efter § 13 og § 14 må kun foretages af læger, der er ansat på sygehuse eller lignende institutioner, og som Sundhedsstyrelsen har godkendt dertil.

Stk. 2. Indgreb efter § 14 må ikke foretages af de læger, der har behandlet afdøde under dennes sidste sygdom eller har konstateret personens død.

Stk. 3. Indgreb efter § 14 må ikke finde sted, såfremt der skal foretages retslægeligt ligsyn eller retslægelig obduktion, medmindre indgrebet må antages at være uden betydning for resultatet af undersøgelsen.

Kapittul 5
Aðrar reglur

§ 16. Onnur inntriv á ein deyðan enn nevnd eru í kapittul 3 og 4 mugu ikki gerast, um so er at hin deyði eftir at hava fylt 18 ár skrivliga hevur tikið avgerð um hetta.

Stk. 2. Tílíkt inntriv má í fyrsta lagi gerast, tá ið óbøtiligur steðgur av andadrátti og hjartavirksemi er hendur.

§ 17. Lógin er samsvarandi galdandi fyri deyðføddar persónar.

Stk. 2. Lógin er ikki galdandi fyri tøku av blóði, burturtøku av minni húðaøkjum og onnut minni inntriv, ið heilt mugu javnmetast við hetta.

§ 18. Løgmálaraðharrin kann áseta nærri reglur um viðgerð av líkum, um líkskoðan, líkuppskurð og um deyðsváttanir.

Kapitel 5
Andre bestemmelser

§ 16. Andre indgreb på en afdød end nævnte i kapitel 3 og 4 må kun foretages såfremt afdøde efter sit fyldte 18. år skriftligt har truffet bestemmelse herom.

Stk. 2. Sådanne indgreb må først foretages, når uopretteligt ophør af åndedræt og hjertevirksomhed er indtråd.

§ 17. Loven finder tilsvarende anvendelse på dødfødte personer.

Stk. 2. Loven gælder ikke for udtagelse af blod, fjernelse af mindre hudpartier samt andre mindre indgreb, der ganske må ligestilles hermed.

§ 18. Justitsministeren kan fastsætte nærmere regler om behandling af lig, om foretagelse af ligsyn og om obduktion samt om dødsattester.

Stk. 2. Løgmálaráðharrin ásetir reglur um at ein lækni ikki má sanna deyðsstund, gera líkskoðan, geva deyðsváttan og gera líkuppskurð á persóni, sum læknin hevur havt serligt tilknýti til.
Stk. 3. Hoyrir kanningin í samband við andlátið undir hernaðarligan ákærumyndugleika, kemur løgfræðingur hjá verjumi í staðin fyri løgregluna at gera rættarlæknaliga líkskoðan og rættarlæknaligan líkuppskurð.

§ 19. Ídnaðarmálaráðharrin kann aftaná tingingar við løgmálaráðharran ásetu nærri reglur um líkskoðan og jarðarferð v.m. fyri deyða til sjós.

Stk. 2. Justitsministeren fastsætter regler, hvorefter en læge ikke må konstatere dødens indtræden, foretage ligsyn, udstede dødsattest og foretage obduktion på en person, som lægen har haft en særlig tilknytning til.
Stk. 3. Henhører efterforskningen i forbindelse med dødsfaldet under militær påtalemyndighed, træder forsvarets auditørpersonel i stedet for politiet ved foretagelse af retslægeligt ligsyn og retslægelig obduktion.

§ 19. Industriministeren kan efter forhandling med justitsministeren fastsætte nærmere regler om ligsyn og begravelse m.v. ved dødsfald til søs.

Kapittul 6
Revsi- og ígildissetingarreglur m.v.

§ 20. Brot á § 3, § 4, § 7 og § 8 verða revsað við bót.
Stk. 2. Tann, sum tekur vevnað og annað lívfræðiligt evni til viðgerðar sum nevnt í § 13 ella § 14, ger líkuppskurð í lækna vísindaligum endamáli ella inntriv eftir § 16, uttan at treytirnar í lógini eru loknar, verður revsaður við bót, uttan so at hægri revsing er uppiborðin eftir aðrari lóggávu.
Stk. 3. Tann, ið veitir ella móttekur viðgerð ella annan fíggjarligan fyrimun fyri úttøku ella flyting av vevnaði og øðrum lívfræðiligum evni til viðgerð sum nevnd í § 13 ella § 14, verður revsaður við bót. Sama er galdandi fyri tann, sum við vitan um, at veitt ella móttikið verður gjald sum nevnt í pkt. 1, medvirkar til, at eitt tílíkt inntriv verður gjørt.
Stk. 4. Í fyriskipanum givnar við heimild í lógini, kann ásetast revsing við bót fyri brot á ásetingarnar í fyriskipununum.

§ 21. Fyriskipanin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
Stk. 2. Samstundis fer úr gildi lóg nr. 279 frá 26. mai 1976 um líkskoðan v.m., sum sett í gildi fyri Føroyar við kgl. fyriskipan nr. 534 frá 6. september 1988.

Kapitel 6
Straf- og ikrafttrædelsesbestemmelser m.v.

§ 20. Overtrædelse af § 3, § 4, § 7 og § 8 straffes med bøde.
Stk. 2. Den, der udtager væv og andet biologisk materiale til behandling som nævnt i § 13 eller § 14, foretager obduktion i lægevidenskabeligt øjemed eller indgreb efter § 16, uden at lovens betingelser herfor er opfyldt, straffes med bøde, medmindre højere straf er forskyldt efter anden lovgivning.
Stk. 3. Den, der yder eller modtager betaling eller anden økonomisk fordel for udtagelse eller overførsel af væv og andet biologisk materiale til behandling som nævnt i § 13 eller § 14, straffes med bøde. Det samme gælder den, der med viden om, at der er ydet eller modtaget betaling som nævnt i 1. pkt., medvirker til, at et sådant indgreb foretages.
Stk. 4. I forskrifter, der udstedes i medfør af loven, kan der fastsættes straf af bøde for overtrædelse af bestemmelser i forskrifterne.

§ 21. Anordningen træder i kraft dagen efter dens bekendtgørelse.
Stk. 2. Samtidig ophæves lov nr. 279 af 26. maj 1976 om ligsyn m.v. som den er sat i kraft for Færøerne ved kongelig anordning nr. 534 fra 6. september 1988.

Viðmerkingar:

Tað er Landslæknin, ið við skrivi dagfest 9. september 1991 til Ríkisumboðsmannin hevur mælt til, at tann nýggja líkuppskurðslógin fyri Danmark verður sett í gildi fyri Føroyar, og at málið verð lagt fyri ríkismyndigleikarnar.
Landsstýrið hevur við skrivi dagfest 1. mars 1994 fingið viðmerkingar frá Landfútanum.

Landfútin skjýtur upp, at nakrar tillagingar verða gjørdar í nøkrum einstøkum greinum, og eru hesar settar í uppskot landsstýrisins.

Høvuðsinnihaldið í lógini er, at heiladeyðaeyðkenni verður inntørt, sum eitt deyðseyðkenni afturat, og at treytirnar um samtykki fyri at kunna gera læknavísindaligan líkuppskurð og vevnaðarflutning verða herdar.

Víst verður annars til viðmerkingar landfútans frá 1. mars 1994 vegleiðing løgmálaráðsins frá 8. februar 1993, skriv dagfest 9. september 1991, 28. september 1994 og 10. apríl 1995 við skjølum frá Landslækanum.

Hjálagt er eisini uppskotið til lógina við viðmerkingum og lógin, sum hon var samtykt í fólkatinginum.

Landsstýrið mælir løgtinginum til at samtykja, at lógin kann verða sett í gildi fyri Føroyar.

1. viðgerð 27. mars 1996. Málið varð beint í trivnaðarnevndina, sum 2. mai 1996 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 25. mars 1996 og eftir 1. viðgerð 27. mars 1996 beint í trivnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meiriluti (Kristian Magnussen, Maria Hansen, Lisbeth L. Petersen, Óli Breckmann og Jørgen Niclasen) mæla tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minniluti (Lasse Klein) tekur ikki undir við málinum, men hevur hesar viðmerkingar:

Spurningurin um at seta hesa lógina í gildi fyri Føroyar er fløktur og trupul, og minnilutin heldur ikki, at tað gjørdi nakað, um vit frá føroyskari síðu góvu okkum betri stundir at viðgera hetta mál, og víst verður á, at tíðin at viðgera eitt so stórt mál er alt ov stutt, og tí mælir minnilutin til, at málið verður sent landsstýrinum aftur við boðum um at leggja málið fram av nýggjum fyri tingið í oktober, soleiðis at tingmenn og almennningurin fáa betur stundir og møguleikar at viðgera málið meira nágreiniliga.

2. viðgerð 8. mai 1996. Uppskot frá Tórdi J. Niclasen um at beina málið aftur í nevnd fekk 6-2-15 atkvøður og fall. Samykt við 21-3-0 atkvøðum at beina málið til 3. viðgerð.

3. viðgerð 14. mai 1996. Málið endaliga samykt við 24-5-0 atkvøðum.

FL jnr. 607-1/93.

Broytingaruppskot

til
3. viðgerð av

<u>løgtingsmáli nr. 59/1995: Løgtingslóg um líkskoðan, líkuppskurð og vevnaðarflutning v.m.</u>

Í kap. 4, § 14, stk. 2, verður 2. punktum strikað.

<u>Viðmerkingar:</u>
Broytingin verðvíkir tí partinum av § 14, stk. 2, har skotið verður upp, at vevnaðarflutningur frá tí deyða kann verða gjørdur, um persónurin munnliga hevur óttalað seg um tíllíkt inntriv. Vit meta rettast vera, at hetta loyvi skal vera skrivligt, sum fyrri partur av § 14, stk. 2, krevur, og síggja m.a. vandan verða, tí ynski teirra avvarðandi er í mótstríð við eitt munnligt loyvi, sum onkur (og her átti undir øllum umstøðum ein meiri nágreinilig frágreiðing verið við) sigur, at hin deyði hava óttalað seg um.

Á FØROYA LØGTINGI, 14. mai 1996

Tórður J. Niclasen, Jenis av Rana, Lasse Klein, Jákup Olsen og Ingeborg Vinter

60 Broyting í løgtingslóg um útvarpsnevnd

Ár 1995, tísdagin 19. mars legði Axel Nolsøe, landsstýrismaður, vegna Sámal Petur í Grund, landsstýrismann, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um útvarpsnevnd.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 11 frá 14. februar 1957 um útvarpsnevnd sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 171 frá 22. desember 1995 verður gjørd henda broyting:

Í § 7 verður "25. mars 1996" broytt til: "1. mai 1996".

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar:

27. februar 1996 lat landsstýrið løgtinginum uppskot til nýggja útvarpslóg.

Í lógini um útvarpsnevnd er ásett, at lógin fer úr gildi 25. mars 1996.

13. mars 1996 var 1. viðgerð í løgtinginum av uppskotinum til nýggja útvarpslóg.

Til tess at løgtingið skal fáa stundir til eina gjølliga viðgerð av málinum um nýggja útvarpslóg, mælir landsstýrið løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins um at leingja galdandi lóg um útvarpsnevnd fram til 1. mai 1996.

1. viðgerð 21. mars 1996 og verð beint beinleiðis til 2. viðgerð. Frávik frá tíðarfreistini millum 1. og 2. viðgerð verð givið 21. mars 1996 við 17-0-0 atkvøðum.

2. viðgerð 22. mars 1996. Samtykt at beina málið til 3. viðgerð við 17-0-0 atkvøðum.

3. viðgerð 25. mars 1996. Uppskotið endaliga samtykt við 19-0-0 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 23 frá 25. mars 1996.

61 Broyting í løgtingslóg um sjónvarp

Ár 1996, týsdeginum 19. mars legði Axel Nolsøe, landsstýrismaður, vegna Sámal Petur í Grund, landsstýrismann fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjónvarp.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 77 frá 21. mai 1982 um sjónvarp, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 172 frá 22. desembar 1995 verður gjørd henda broyting:

Í § 13 verður "25. mars 1996" broytt til "1. mai 1996".

§ 2.

Henda lóg fer gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar:

27. februar í ár lat landsstýrið løgtinginum uppskot til nýggja sjónvarpslóg.

1. viðgerð í løgtinginum av hesum máli var 13. mars 1996.

Galdandi sjónvarpslóg fer úr gildi 25. mars 1996.

Til tess at løgtingið skal fáa stundir til eina gjølligu viðgerð av málinum, mælir landsstýrið løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins um at leingja galdandi sjónvarpslóg fram til 1. mai 1996.

1. viðgerð 21. mars 1996. Málið verð beint beinleiðis til 2. viðgerð. Frávik frá tíðarfreistini millum 1. og 2. viðgerð verð givið við 17-0-0 atkvøðum.

2. viðgerð 22. mars 1996. Samtykt at beina málið til 3. viðgerð við 17-0-0 atkvøðum.

3. viðgerð 25. mars 1996. Uppskotið endaligt samtykt við 19-0-0 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 24 frá 25. mars 1996.

62 Broytingar í ferðslulógini

Ár 1996, hósdagin 21. mars legði Tordur J. Niclasen vegna miðflokkin fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 65 frá 9. september 1963 um ferðslu við seinni broytingum verður í §16, stk. 3, "0,8 o/oo" broytt til: "0,2 o/oo".

§ 2.

Lógin verður sett í gildi dagin eftir, at hon er kunugjørd.

Viðmerkingar:

Vandarnir, ið standast av rúsdrekkakoyring hava verið nógv umrøddir, og dømini eru nógv, har avleiðingar hava verið stórir sorgarleikir.

Lond rundan um okkum - undantikið Danmark - hava tikið álvaran av rúsdrekkakoyring til eftirtektar og nýta "promillumark", ið er munandi lægri enn galdandi er her hjá okkum.

Promillumarkið í Danmark er 0,8, Íslandi 0,5, Noreg 0,5, Finlandi 0,5 og í Svøríki er markið 0,2 o/oo.

Í Føroyum er danska markið galdandi, nevniliga 0,8 o/oo.

Áskoðan Miðfloksins er, at danski "standardur" á besum øki ikki longur eigur at vera galdandi, men at promillumarkið nú eigur at lækka.

Hetta verður gjørt til tess at undirstrika týdningin av promillufríari koyring sum náttúrligur partur av ábyrgdarfullum ferðslupolitikki, har rúsdrekka og ferðsla als einki eiga at hava við hvørt annað at gera.

Einki at ivast í, at verður uppskotið samtykt, vil tað minka um avleiðingarnar, sum annars standast av "promillukoyring".

Nevnast kann, at rættarnevnd løgtingsins áður hevur viðgjørt líknandi uppskot frá okkum, og segði nevndin í álitinum m.a.: "landsstýrið arbeiddi við broytingum í ferðslulógini ..."

Uttan at seta nakað uppskot fram mælti rættarnevndin annars til at senda landsstýrinum málið.

Hvørjar fíggjarligar avleiðingar verða, er helst torført at meta um, men tó kann við vissu sigast, at vinningurin fyri tað føroyska samfelagið sum heild verður ómetaligur stórur - serliga tá hugsað verður um at broytt ferðslumentan, stavandi frá uppskoti okkara, kemur at føra við sær tryggari ferðslu og harvið færri materiellar og menniskjaligar skaðatilburðir, sum mangan ikki kunnu roknast í krónum og oyrum.

Tá nú so drúgv tíð er gingin, og einki uppskot besum viðvíkjandi er komið úr landsstýrinum, verður enn einaferð roynd gjørd at fremja nevndu broytingar í ferðslulógini.

I, viðgerð 16. apríl 1996. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 8. mai 1996 legði fram soljóðandi

Á l i l

Málið er lagt fram av Miðflokkinum tann 21. mars 1996 og eftir 1. viðgerð tann 16. apríl 1996 beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur í hesum sambandi havt fund við Axel Nolsøe, landsstýrismann.

Á fundinum var upplýst, at landsstýrið á ólavsøku í ár fór at leggja fram uppskot um broytingar í ferðslulógini.

Upp á beinleiðis fyrispurning segði landsstýrismaðurin, at hann eisini fór at koma við broytingum í samband við promillumarkið, um rættarnevndin heitti á hann.

Rættarnevndin kann taka undir við, at sonevnda promillumarkið í ferðslulógini verður endurskoðað.

Ásannandi at hetta mark er væl lægri í londunum uttan um okkum, og at royndirnar av einum meira strongum ferðslupolitikki á hesum øki hava hepnast væl, staðfestir rættarnevndin, at tiltrongt er við ábótum, og at allur spurningurin um rúsdrekkakoyring eigur at umhugsast av nýggjum.

Ein samd rættarnevnd mælir landssstýrinum til at arbeiða víðari við málinum við tí endamáli at lækka promillumarkið.

Rættarnevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Vísandi til omanfyrinevndu viðmerkingar tekur eini **meiriluti** (Bjørn á Heygum, Marita Petersen, Signar á Brúnni, Ingeborg Vinther, Jógvan á Lakjuni og Sune Jacobsen) ikki undir við uppskotinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin í rættarnevndin (Lasse Klein) tekur undir við uppskoti Miðfloksins og mælir tinginum at samtykkja tað og hevur annars hesar viðmerkingar:

Áður hevur Kristiligi Fólkaflokkurin lagt fram uppskot um broytingar av promillumarkinum, men uppskotið fekk ikki undirtøku tá. Høvuðsinnihaldið í hesum broytingum vóru, at í ferðsluni átti fullkomið bann at verða sett fyri nýtslu av alkoholi og øðrum rúsandi evnum.

So hvørt sum samferðslukervið er vorðið úthygt, og akfar er vorðið alramanna ogn, hava vanlukkurnar vegna rúsdrekkakoyring verið støðugt vaksandi.

Verandi lóg skilir millum promillukoyring og rúsdrekkakoyring. Skal lógin hava ávirkan, ið munar nakað á ferðsluhugburðinum í samband við rúsdrekkakoyring, so skal øll koyring oman fyri eitt ógvuliga lítið promillumark tuetast sum rúsdrekkakoyring. Hetta er tað sama, sum er galdandi í ávísum grannalondum okkara, har promillumarkið er munandi lægri enn her heima hjá okkum, og er uppskotið um at lækka promillumarkið sera skilagott.

Uppskotið fall við 2-5-16 atkvøðum.

63 Eftirgeving av ella gjaldskipan fyri skuld til landskassan.

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Anfinn Kallsberg, løgtingsmaður, vegna fólkaflokkin fram soljóðandi

Uppskot

til

Løgtingslóg um eftirgeving av ella gjaldskipan fyri skuld til landskassan.

§ 1. Landsstýrismanninum í fíggjarmálum er heimilað, tá ið pant er selt við tvingsilssølu, og landskassin ikki hevur fingið fulnað, og ikki er útlit til, at skuldarin er førur at rinda skuldina aftur, alla ella ein part av henni, at eftirgeva restskuldina, alla ella part av henni.

Stk. 2. Landsstýrismanninum í fíggjarmálum er heimilað, tá landskassin eftir øllum at dømna ikki við tvingsilssølu av pantinum fær fulnað, og umstøðurnar annars tala fyri at gera avtalu um rindan av skuldini, eisini at eftirgeva hana alla ella part av henni, uttan at farið verður undir tvingsilssølu.

Stk. 3. Landsstýrismanninum í fíggjarmálum er heimilað í førum, har pant ikki er fyri skuldina, og skuldarin eftir øllum at dømna ikki er førur at rinda hana aftur, og umstøðurnar annars tala fyri at gera avtalu um rindan av skuldini, eisini at eftirgeva hana, alla ella part av henni.

§ 2. Landsstýrið skal í kunngerð úseta nærri reglur fyri eftirgeving av og gjaldskipan fyri skuld til landskassan, og fyri umsitingina av hesi lóg.

§ 3. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar:

Á. mars 1987 legði Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram mál við sama heiti sum hesum (løgtingsmál nr. 73/86).

Í viðmerkingunum verður sagt:
"Tann spurningurin hevur verið frammi, um landsstýrið hevur heimild til, møguliga saman við fíggjarnevndini, at eftirgeva alt ella partar av krøvum, landskassin hevur í samband við veiting av eitt nú studulslánum, studningslánum, kreppulánum, serlánum og øðrum lánum og krøv í samband við veðhaldsódegg. Onnur dømi enn hesi eru, har landskassin er kreditor eisini óheinleiðis eitt nú fyri lán, veitt úr grunnunum undir landsstýrinum. Húsalánsgrunnurin, Menningargrunnurin o.s.fr.

Er eigarin av tí ognini, sum er sett í veð sum trygd fyri lánni, farin á húsagang, ella felagið er avtikið, verður tann parturin av kravi landskassans, sum ikki fæst úr bónum, og skuldarin er eitt partafelag, ella eingin ábyrgist persónliga, avskrivaður. Í øllum øðrum førum er skuldari, ið persónliga stendur fyri skuldini, og her fæst ikki sama ásannan av, at einki er at heinta. Úrslitið er tí, at skuldarin framvegis stendur fyri skuldini, um eingin heimild er til at avskriva alt ella t.d. gera avtalu við skuldaran um t.d., at hann rindar ein part, sum hann er mentur til, og tað, ið eftir er, verður eftirgivið.

Ein slík avtala er ikki bert ein hjálp til skuldaran, sum ikki skal verða verandi undir eini skuldatbyrðu, hann ikki hevur møguleikar fyri at lyfta, men eisini ein fyrimunur hjá landskassanum, sum tá hevur ein møguleika at fáa nakað.

Um løgtingið viðtekur tá broytingina í konkurslógini um endurskipan (saneringsordning) í skiftirettinum, er har eisini ein útvegur hjá skuldara at fáa skit á skuldini."

Í løgtingsmáli nr. 159/92 verður lógin avtikin, við tí grundgeving, at lóg um veðhald fyri lánum til frysti- og flakavirkir, løgtingsmál nr. 195/92 varð sett í gildi.

Henda lógin hevði til endamál at geva landsstýrinum heimild í sambandi við eina skipaða skuldarsanering í 1993 av fiska- og flakavirkjunum (serlóg at skipa Føroya Fiskavirking).

Harafrat hevði landsstýrið heimild at umleggja studuls-, ser- og kurstapslán, sum ikki vóru fallin til gjaldingar 1. januar 1993 til studningslán, og at avskriva veðhald, sum ikki vóru effektiv í sama mun, sum bankin avskrivaði hesi somu lán.

Undirritaði vísti á í álitinum 159/92, at ongar heimildir vóru hjá landsstýrinum ella grunnum at verða við í sanering, sum var fallin til gjaldingar, og úrslitið síggja vit í dag.

Menningargrunnurin og Húsalánsgrunnurin hava verið við í saneringum, hóast heimildirnar samtvert viðmerkingar hjá landsstýrinum í løgtingsmáli nr. 73/86, eru ógvuliga ivasamar. Landskassin hevur ikki verið við í saneringum og úrslitið er, at bruttoskuldin til landskassan er fleiri milliardir.

Tað er eingin lóggáva, sum heimilar sanering fyri gjaldkomna skuld í landskassan.

Tá eingin heimild er fyri at landsstýrið luttekur í einari samlaðari sanering, hevur hetta í mongum føri fört við sær, at ein annars gjøgnumførlig sanering av frammanfyriliggjandi prioritetum ikki kundi gjøgnumførast, og skip ella virkir tí fóru yvir eina tvingsilssølu við tí úrslit, at landskassin misti alt. Politiska støðutøkan um at skula hava alt ella einki hevur fört við sær, at har tað snýr seg um partafeløg, hevur landskassin mist alt, heldur enn at havt møguleikan at verið við í eini sanering, og so kunna fingið ein part.

Seinastu tíðina hava vit hoyrt í fjølmiðlunum, at Føroya gjaldstova hevur sett í verk eina nýggja innheintingarskipan. Eisini hava vit hoyrt, at landskassin eigur meira enn 500 mió. kr. úti hjá fyritøkum og einstaklingum fyri gamla skuld. Av hesum verður roknað við, at einar 450 mió. eru taptar, tí skip og virkir, sum vóru ogn hjá einum partafelag eru farin á húsagang, og tí er neyvan møguligt at fáa fulnað fyri landskassans ágóða í hesum feløgum.

Skip og virkir, sum ikki vóru í einum felag, men í staðin vóru ogn og arbeiðspláss hjá einstaklingum, eru eisini í fleiri førum farin á húsagang, og eru síðani seld øðrum. Eisini hava hesi mist hús og heim og sita í dag eftir við stórari skuld, bæði til bankan og í nógvum førum eisini til landskassan.

Skuldin til landskassan er í flestu førum effektiv veðhald, sum bankin hevur fingið útgoldið úr landskassantum, áðrenn tvingsilssølan fór fram. Persónar, sum koma soleiðis fyri, kunnu fáa eina sanering, har tað snýr seg um skuld til pengastovnar, men tá tað kemur til landskassan, ber ikki til av teirri einfaldu orsøk, at landsstýrið onga heimild hevur at vera við í eini slíkari sanering. Úrslitið er, at nú nýggja innheintingarskipanin fer at virka, kemur gjaldstovan at senda krav til arbeiðsgevara, ALS ella almannastovuna, alt eftir hvaðani inntøkan kemur, um at afturhalda 75% av lønini. Úrslitið verður, at hesi fólk ongan annan møguleika hava enn at flýggja av landinum, so langt burtur, at gjaldstovan ikki røkkur teimum við sínum krøvum.

Vit skulu sjálvandi royna at verja landskassans ognir best møguligt, men spurningurin er so, hvussu hetta verður gjørt.

Tað er eingin loysn at smildra familjur, at drepa virkishugin hjá annars virkisfýsnum persónum, bert tí landsstýrið ikki vil hava heimild at gera eina rimiliga skuldarsanering soleiðis, at hesir persónar fáast aftur í gongd og harvið skapa virðir bæði til sín og sína familju, og harvið aftur stríðla undir ein sunnan búskap.

Lata vit bert standa til, gera vit hesar persónar til samfelagstaparar, sum í besta falli flýggja av landinum, og í ringasta falli enda sum sosialir taparar.

Fyriliggjandi uppskot skuldi kunna bott mannundir um útimanina av innheintingini av skuld til tað almenna. Tað er neyvan møguligt at fremja eina holla málsviðgerð uttan, at lógarheimild fyri gjaldskipan/eftirgeving sum partur av hesi málsviðgerð.

Tað verður neyvan nakar fíggjarligur meirkostnaður fyri tað almenna av hesum lógaruppskoti. Vit hava frammanundan fólk í starvi á gjaldstovuni, sum taka sær av hesum arbeiði. Hetta lógaruppskotið, um tað

verður samtykt, kemur at lætta munandi um arbeiðið upp á longri sikt, tí lógin er eitt neyðugt amboð í hesum arbeiði fyri at fáa avslutta tey mongu innheintingarmálini, sum nú liggja á gjaldstovuni.

Hin vegin kann sigast, at gjaldstovan við hesi heimild kann fáa nógv meira av tí almennu útistandandi skuldini í kassan.

Heldur ikki skuldi fyriliggjandi uppskot økt arbeiðsbyrðuna at útinna fyrisitingina meiri effektivt.

Uppskotið hevur ikki verið úti hjá almennum stovnum til ummælis.

Viðmerkingar til tær einstøku greinarnar:

Heimildin verður givin landsstýrismanninum í fíggjarmálum, tí eftir nýggju stýrisskipanini er tað landsstýrismaðurin, sum hevur ábyrgdina av, at heimildin verður umsitin eftir ásetingunum í hesi lóg. Hesi sjónarmið eru galdandi fyri útinning eftir ásetingunum í kunngjørdari reglugerð sambært § 2.

§ 1, stk. 1 gevur heimild til landsstýrismannin í fíggjarmálum at gera gjaldskipan og ella eftirgeva skuld, fyri skuld, sum ikki er fult goldin fyri pant, sett á tvingsilssølu. Tá sølan er farin fram, og tað er eitt felag, sum stóð fyri hesum panti, og einki veðhald er, má metast, at ikki meira er at gera í samband við innheintingina. Er tað har aftur ímóti privatpersónum ella privat kaution, eigur tað í reglugerðini sbrt. § 2 at verða ásett, hvussu nógv av hesum kravi veruliga kann krevjast inn, meðan restin verður strikað.

Stk. 2 verður galdandi á sama hátt, men er her talan um at fremja saneringina uttan, at pantið fer um eina tvingsilssølu. Tað hevði verið eftir hesi grein, at landskassin hevði havt fingið mistan pening inn, um hendan lóg hevði verið í gildi seinastu árini. Tað er eisini hesa skipan, sum Menningargrunnurin og Húsalánsgrunnurin hava nýtt í sínum innheintingararbeiði við góðum úrsliti, hóast heimildin til at gera tað fór úr gildi í 1993.

Stk. 3 verður galdandi á sama hátt sum stk. 1 og 2, og verður at nýta, tá einki pant er aftan fyri skuldina, t.d. effektivt veðhald.

§ 2. Tað er landsstýrið samlað, sum skal góðkenna ásetingarnar í reglugerðini fyri umsitingini, og skal henda reglugerðin almannakunngerast soleiðis, at borgarin veit, hvørjar reglur eru galdandi á økinum.

1. viðgerð 12. apríl 1996. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 8. mai 1996 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av fólkaflokkinum tann 25. mars 1996 og eftir 1. viðgerð tann 12. apríl 1996 beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur innkallað Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann í fíggjarmálum, og Tummas Magnussen, fulltrúa.

Upp á fyrispurning, um tørvur er á eini slíkari lóggávu um positiva heimild til tess at gera gjalds- og akkordskipanir v.m. og í hesum sambandi eftirgeva skuld til landskassan, varð svarað, at landsstýrið altíð hevur havt ein slíkan myndugleika og harvið nú eins og áður hevur havt rættin til at gera slíkar avtalur við skuldarar, um hetta bert kann tæna áhugamálum landskassans.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum vildi enntá ganga so langt sum at siga, at landsstýrið ikki bara hevði ein slíkan rætt, men eisini eina skyldu til at gera skilagóðar avtalur við sínar skuldarar, sjálvt um hetta bar í sær avskriving av munandi upphæddum, - tó sjálvsagt undir tí greiða fyrivarni, at tað kundi staðfestast, at hetta gagnaði landskassaáhugamálum í hvørjum einstøkum føri.

Einstakir nevndarlimir undraðust á hetta brádliga umskifti í stuðutakan landsstýrisins til umrøddu spurningar.

Víst var á, at tað í fleiri førum var komið fyri, at áheitanir um at fáa til vega skilagóðar akkordskipanir í samband við skuld til tað almenna vóru vístar aftur við tí grundgeving, at eingin heimild var at eftirgeva skuld til landskassan.

Eitt serlyribrigdi, sum kundi hava áhuga í hesum sambandi, var, at ein løgtingslóg um at geva landsstýrinum heimild til at eftirgeva skuld til landskassan í síni tíð var samtykt júst út frá tí sjónarmiði, at henda heimild frammanundan ikki var til staðar, men mátti útvegast beinleiðis við løgtingslóg.

Henda løgtingslóg er nú farin aftur úr gildi, tá politiski myndugleikin ikki metti tað vera ráðiligt at varðveita eina tílíka heimild.

Eftir hesar útsagnir sóknaðist nevndin eftir eini løgfrøðiligari frágreiðing og niðurstøðu, sum kundu undirbyggja hesi sjónarmið nærri.

Tummas Magnussen endurtók í hesum sambandi fyri nevndini tað, sum áður var ført fram, um, at løgfrøðingarnir í dag høvdu eina aðra áskoðan til hetta mál og nú vóru á einum máli um, at almennir myndugleikar eins og aðrir kreditorar høvdu bæði rætt og skyldu til at gera skilagóðar avtalur við sínar skuldarar, um hetta í bvørjum einstøkum førum gav eitt betri peningaligt úrslit, enn um eingin avtala varð gjørd, og skuldin treytaleyst fasthildin.

Eisini vísti Tummas Magnussen á, at almennir myndugleikar aðrastaðni mettu seg at hava sama rætt til at gera slíkar avtalur uttan positiva lógarheimild, og var hetta eisini í stóran mun nýtt í tí dagliga arbeiðinum.

Út frá tí, sum ber er ført fram, heldur landsstýrið ikki, at tørvur er á nakrari lóggávu um eftirgeving av skuld til landskassan, tá henda heimild longu er til staðar frammanundan.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Bjørn á Heygum, Marita Petersen, Signar á Brúnni, Sune Jacobsen, Ingeborg Vinther) vísir til frammanfyri tilskilaðu viðmerkingar og tekur ikki undir við uppskoti fólkafloksins.

Minnilutin (Jógvan á Lakjuni og Lasse Klein) hevur hesar viðmerkingar:

Minnilutin heldur ikki, at heimildin til at eftirgeva skuld til landskassan er nóg greið, og ivasamt er, hvussu almennu myndugleikarnir fara at umsita hesa reglu í framtíðini.

Umráðandi er at tryggja bæði landskassanum og tí einstaka borgaranum ein møguleika til við lóg at fáa gjørt skilagóðar gjaldsskipanir, sum í seinasta enda gagna báðum pørtum best.

Út frá hesum verður hildið neyðugt at útvega greiðar lógarkarmar fyri, hvussu hesi mál skulu umsitast, so at einki ivamál skal vera um hesa heimild í framtíðini.

Minnilutin (Jógvan á Lakjuni og Lasse Klein) mælir við hesum til at samtykkja uppskot fólkafloksins.

2. viðgerð 13. mai 1996. Uppskot fólkafloksins fall við 8-1-16 atkvøðum.

64 Broyting í ymiskum løgtingslógum um undirvísing

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í ymiskum løgtingslógum um undirvísing.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 21 frá 22. mars 1979 um fólkaskúlan sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 121 frá 21. mai 1993 verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 3, stk. 3, 4 og 5, § 9, stk. 3 í fyrsta og seinasta setningi, § 11, stk. 2, § 12, stk. 2, § 14, stk. 1 og 2, § 20, stk. 8, § 22, stk. 2, § 22a, stk. 6, § 23, stk. 2 í fyrsta setningi, § 24, stk. 3, § 26, § 28, stk. 6 og stk. 7 í fyrsta setningi, § 29, stk. 3, § 30, stk. 1, § 33, stk. 2, § 34 stk. 8, § 35, stk. 1, 2, 3 og 4, § 37, § 38, § 40, § 44, stk. 2 og 4, § 45, stk. 3, § 47, stk. 4, § 48, § 50 og § 51 verður orðið "Landsskúlaráðið" broytt til: "Landsstýrismaðurin".

2) Í § 15, § 28, stk. 2, § 29, stk. 2, § 33, stk. 1, § 35, stk. 5 og § 36, stk. 1 og 2, verður orðið "Landsskúlaráðnum" broytt til: "landsstýrismanninum".

3) Í § 20, stk. 7, § 23, stk. 2 í øðrum setningi, § 28, stk. 7 í seinasta setningi, § 33, stk. 1, pkt. 5, § 34, stk. 3, § 49 og § 52 verður orðið "Landsskúlaráðið" broytt til: "landsstýrismaðurin".

4) Í § 20, stk. 6, § 21, § 25, stk. 3 og § 56, stk. 4 verður orðið "Landsstýrið" broytt til: "Landsstýrismaðurin".

5) Í § 22, stk. 1 verður orðið "landsstýrið" broytt til: "landsstýrismaðurin".

6) Í § 30, stk. 5 og § 32 stk. 2 verður orðið "landsstýrinum" broytt til: "landsstýrismanninum".

7) Í § 22a, stk. 5 verður orðið "Landsskúlafyrisitingin" broytt til: "Landsstýrismaðurin".

8) Í § 29, stk. 3 verður orðið "Skúlafyrisitingin" broytt til: "Landskassin".

9) Í § 29, stk. 3 verður 3. setningur: " og verða tær býttar,....." strikaður.

10) Í § 29, stk. 3, í 5. setningi verða orðini "av skúlafyrisitingini" broytt til: "úr landskassanum".

11) Í § 29, stk. 3 verður seinasti setningurin strikaður.

§ 2.

Í løgtingslóg nr. 101 frá 1. desember 1978 um stuðning til fólkahúskúlar verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 2, stk. 1 og § 6, stk. 1 verður orðið "landsstýrinum" broytt til: "landsstýrismanninum".

2) Í § 3, pkt. 1 verður orðið "landsstýrisins" broytt til: "landsstýrismansins".

3) Í § 3, pkt. 5 og § 5 verður orðið "landsstýrið" broytt til: "landsstýrismaðurin".

§ 3.

Í løgtingslóg nr. 66 frá 13. mai 1992 um húsarhaldsskúlar verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1, stk. 3, § 4, stk. 1, § 5, stk. 1 og 3 og § 13 verður orðið "Føroya Landsstýri" broytt til: "Landsstýrismaðurin".

2) Í § 5, stk. 1, § 6, stk. 4, § 12, stk. 1 og 4, § 15, stk. 2 og § 16, stk. 2 verður orðið "Landsstýrið" broytt til: "Landsstýrismaðurin".

3) Í § 1, stk. 2 og § 15, stk. 1 verður orðið "Landsskúlaráðið" broytt til: "Landsstýrismaðurin".

4) Í § 4, stk. 1, pkt. 1 verður orðið "Landsskúlaráðið" broytt til: "lands-stýrismaðurin".

5) Í § 4, stk. 1, pkt. 2 og 4 verður orðið "Landsskúlaráðnum" broytt til: "landsstýrismanninum".

6) Í § 3, § 4, stk. 2, § 6, stk. 2 í triðju setningi og § 10, stk. 3 verður orðið "Landsskúlafyrisitingin" broytt til: "Landsstýrismaðurin".

7) Í § 6, stk. 2 í fjórða setningi verður orðið "Landsskúlafyrisitingina" broytt til: "landsstýrismannin".

8) Í § 6, stk. 3 í seinna setningi og § 8, stk. 2, pkt. 1 verður orðið "Landsskúlafyrisitingin" broytt til: "landsstýrismaðurin".

9) Í § 7, stk. 3 í seinasta setningi, stk. 4 í øðrum setningi og § 8, stk. 2 í fyrsta setningi verður orðið "Landsskúlafyrisitingini" broytt til: "landsstýrismanninum".

10) Í § 8, stk. 1 verður orðið "Landsskúlafyrisitingarinnar" broytt til: "landsstýrismansins".

§ 4.

Í løgtingslóg nr. 70 frá 30. juni 1983 um frítíðarundirvising v.m. verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 3, stk. 2, § 5, stk. 3, § 7, stk. 2, § 13, stk. 4, § 15, stk. 1, § 17, stk. 2 og § 21 verður orðið "Landsskúlafyrisitingin" broytt til: "Landsstýrismaðurin".

2) Í § 10 verður orðið "Landsskúlafyrisitingini" broytt til: "landsstýrismanninum".

3) Í § 18, stk. 3 verður orðið "Landsskúlafyrisitingin" broytt til: "landsstýrismaðurin".

4) Í § 4, stk. 3, § 5, stk. 2, § 9, stk. 2 og 3, § 13, stk. 2, 5 og 6, § 15, stk. 2, § 17, stk. 3 og § 19, stk. 4 verður orðið "Landsskúlaráðið" broytt til: "Landsstýrismaðurin".

5) Í § 8, § 12, stk. 3, § 13, stk. 1 og § 17, stk. 1 verður orðið "Landsskúlaráðið" broytt til: "landsstýrismaðurin".
6) Í § 14, stk. 2 og 3 verður orðið "Landsskúlaráðsins" broytt til: "landsstýrismansins".
7) Í § 16 verður orðið "Landsskúlaráðnum" broytt til: "landsstýrismanninum".
8) Í § 5, stk. 1, § 9, stk. 1, § 11, stk. 3 verður orðið "Landsstýrið" broytt til: "Landsstýrismaðurin".

§ 5.

Í løgtingslóg nr. 69 frá 7. juni 1984 um stuðul til musikkskúlar verða gjørdar hesar broytingar:
1) Í § 2, stk. 3, § 6, stk. 2 og § 7, stk. 2 verður orðið "Landsskúlaráðið" broytt til: "Landsstýrismaðurin".
2) Í § 3, stk. 1, § 5, stk. 2 og § 6, stk. 1 verður orðið "Landsskúlaráðnum" broytt til: "landsstýrismanninum".
3a) Í § 7, stk. 1 verður orðið "landssskúlastjórin" broytt til: "landsstýrismaðurin".
3b) Í § 7, 1. stk. verður orðið "Landsskúlafyrisitingina" broytt til: " landsstýrismannin".
4) Í § 3, stk. 2, pkt. 5 og § 8, stk. 2 verður orðið "Landsskúlafyrisitingini" broytt til: "landsstýrismanninum".

§ 6.

Í løgtingslóg nr. 69 frá 28. mai 1980 um læraraútbúgving verða gjørdar hesar broytingar:
1) Í § 3, § 6, stk. 2, § 8, § 9, stk. 4, § 12, stk. 1, § 17, stk. 2, § 21, § 24, stk. 4 og § 29, stk. 2 verður orðið "Landsskúlastjórin" broytt til: "Landsstýrismaðurin.
2) Í § 12, stk. 2 í fyrsta og øðrum setningi verður orðið "landsskúlastjórin" broytt til: "landsstýrismaðurin".
3) Í § 17, stk. 1 verður orðið "landsskúlastjóran" broytt til: "landsstýrismaðurin".
4) Í § 4, § 13, § 16 og § 28 verður orðið "Landsstýrið" broytt til: "Landsstýrismaðurin".
5) Í § 12, stk. 3, § 26 og § 27 verður orðið "landsstýrið" broytt til: "landsstýrismaðurin".
6) Í § 10, stk. 1 og § 25, stk. 2 verður orðið "Landsskúlaráðið" broytt til: "landsstýrismaðurin"
7) Í § 14, § 18, stk. 2 og § 19, stk. 2 verður orðið "Landsskúlaráðið" broytt til: "Landsstýrismaðurin.

§ 7.

Í løgtingslóg nr. 36 frá 13. mai 1959 um útgávu av skúlabókum sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 84 frá 24. oktober 1978 verða gjørdar hesar broytingar:
1) Í § 1 verður orðið "Landsskúlastjúrin" broytt til: "Landsstýrismaðurin".
2) Í § 2 verður orðið "landsstýrinum" broytt til: "landsstýrismanninum".

§ 8.

Í løgtingslóg nr. 43 frá 5. mai 1987 um Føroya Yrkisskúla fyri fiskaidnað og havbúnað verða gjørdar hesar broytingar:
1) Í § 1, stk. 1 verður orðið "landsstýrinum" broytt til: "landsstýrismanninum".
2) Í § 1, stk. 2 verður orðið "landsstýrisins" broytt til: "landsstýrismansins".
3) Í § 5, stk. 2 og § 12, stk. 4 verður orðið "landsstýrið" broytt til: "landsstýrismaðurin".
4) Í § 6, § 9, stk. 1 og 2, § 11, stk. 1 og 2 og § 13 verður orðið "Landsstýrið" broytt til: "Landsstýrismaðurin".
5) Í § 8 verður orðið "landsskúlafyrisitingin" broytt til: "landsstýrismaðurin".
6) Í § 10 verða orðini "Skúlanyndug-teikarnir seta og loysa..." broytt til: "Landsstýrismaðurin setir og loystir...".
7) Í § 12, stk. 1 verður orðið "Landsskúlastjórin" broytt til: "Landsstýrismaðurin".
8) Í § 12, stk. 2 verður orðið "landsskúlastjóranum" broytt til: "landsstýrismanninum".

§ 9.

Í løgtingslóg nr. 49 frá 5. mai 1987 um grundáthúgving innan fyrisitingar-, handils- og skrivstovuøkið verða gjørdar hesar broytingar:
1) Í § 1 verður orðið "Landsstýrinum" broytt til: "Landsstýrismanninum".
2) Í § 2, stk. 3 og § 3, stk. 2 verður orðið "Landsskúlaráðið" broytt til: "Landsstýrismaðurin".
3) Í § 2, stk. 5 verður orðið "landsskúlaráðnum" broytt til: "landsstýrismanninum".
4) Í § 3, stk. 1 og § 6 verður orðið "Landsstýrið" broytt til: "Landsstýrismaðurin".
5) Í § 4, stk. 2 verður orðið "landsstýrið" broytt til: "landsstýrismaðurin".
6) Í § 4, stk. 3 verða orðini "Lærararáðið" broytt til: "Landsstýrismaðurin".

§ 10.

Í løgtingslóg nr. 47 frá 28. apríl 1992 um stuðisútbúgving innan tøkni verða hesar broytingar gjørdar:
1) Í § 1, stk. 1 verður orðið "Landsstýrinum" broytt til: "Landsstýrismanninum".
2) Í § 3, stk. 3 og § 4, stk. 2 verður orðið "landsstýrinum" broytt til: "landsstýrismanninum".

3) Í § 3, stk. 1 og 2, § 7, stk. 3, § 8, stk.2 og § 9, stk. 3 verður orðið "Landsstýrið" broytt til: "Landsstýrismaðurin".
4) Í § 6, stk. 1 og § 10 verður orðið "Landsskúlaráðið" broytt til: "Landsstýrismaðurin".
5) Í § 6, stk. 2 verður orðið "Landsskúlafyrisitingin"

broytt til: "Landsstýrismaðurin".

§ 11.

Í løgtingslóg nr. 128 frá 21. mai 1993 um tøkniligar yrkisútbúgvingar verða gjørdar hesar broytingar:
1) Í § 1 verður orðið "Landsstýrinum" broytt til: "Landsstýrismanninum".
2) Í § 4, § 5, stk. 2, § 6, stk. 3, § 10, stk. 1 og 2, § 11 stk. 3, § 16, stk. 1 og 2, § 17, stk. 4, § 21 og § 22, stk. 1 og 2 verður orðið "Landsstýrið" broytt til: "Landsstýrismaðurin"
3) Í § 5, stk. 1 og 3, § 9, § 18, stk. 1 og 2, § 19, stk. 2 og § 20, stk. 1 verður orðið "landsstýrið" broytt til: "landsstýrismaðurin".
4) Í § 18, stk. 1, § 20, stk. 1 og § 21 verður orðið "landsstýrinum" broytt til: "landsstýrismanninum".
5) Í § 5, stk. 1 verða orðini "Eftir tilmæli frá vinnuskúlaráðnum setir landsstýrið" broytt til: "Landsstýrismaðurin setir".
6) Í § 9 verða orðini "eftir tilmæli frá vinnuskúlaráðnum" strikað.
7) § 10, stk. 4 verður orðað soleiðis: "Næmingi, sum skiftir útbúgving, kann verða veitt ískoytisskeið".
8) Í § 11, stk. 3 og § 18, stk. 2 verða orðini "eftir tilmæli frá vinnuskúlaráðnum" strikað.
9) § 21 verður strikað, og §§ 22 og 23 verða broyttar til: ávikavist § 21 og § 22.
10) "Kapittul 6" verður broytt til: "Kapittul 5" og "Kapittul 7" verður broytt til: "Kapittul 6".

§ 12.

Í løgtingslóg nr. 129 frá 21. mai 1993 um hægri tøkniliga útbúgving verða gjørdar hesar broytingar:
1) Í § 1, stk. 1 verður orðið "Landsstýrinum" broytt til "Landsstýrismanninum".
2) Í § 2, stk. 2 og § 10, stk. 2 verður orðið "landsstýrinum" broytt til: "landsstýrismanninum".
3) Í § 2, stk. 3, § 3, stk. 2, § 4, stk. 2 og 5, § 7, stk. 3, § 8, stk. 3, § 9, §10, stk. 3, § 11, stk. 2 og § 13 stk. 2 verður orðið "Landsstýrið" broytt til: "Landsstýrismaðurin".
4) Í § 6, stk. 1, § 11, stk. 1 og § 13, stk. 1 verður orðið "landsstýrið" broytt til: "landsstýrismaðurin".
5) Í § 12 verður orðið "Landsskúlaráðið" broytt til: "Landsstýrismaðurin".

§ 13.

Í løgtingslóg nr. 127 frá 21. mai 1993 um hægri handilsútbúgving verða gjørdar hesar broytingar:
1) Í § 1, stk. 1 verður orðið "Landsstýrinum" broytt til: "Landsstýrismanninum".
2) Í § 2, § 4, stk. 2, § 8, stk. 1 og 2, § 9, stk. 2 og 3, § 12, stk. 1 og 2, § 13, stk. 3, § 14, stk. 2, § 17, § 18, stk. 3, § 19, § 20 og § 22, stk. 2 verður orðið "Landsstýrið" broytt til: "Landsstýrismaðurin".
3) Í § 3, stk. 1, § 10, stk. 1, § 15 og § 22, stk. 3 verður orðið "landsstýrið" broytt til: "landsstýrismaðurin".
4) Í § 16, stk. 2 verður "Føroya Landsstýri" broytt til: "Landsstýrismaðurin".
5) Í § 18, stk. 2 verður orðið "landsstýrinum" broytt til: "landsstýrismanninum".

§ 14.

Í løgtingslóg nr. 65 frá 5. juni 1984 um sjómansútbúgving sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 64 frá 21. mai 1987, verða gjørdar hesar broytingar:
1) Í § 1 verður orðið "Landsstýrinum" broytt til: "Landsstýrismanninum".
2) Í § 7, stk. 1 og § 8 verður orðið "Landsstýrið" broytt til: "Landsstýrismaðurin".
3) Í § 4, stk. 1 verður orðið "Landsskúlastjórin" broytt til: "Landsstýrismaðurin".
4) Í § 4, stk. 2 verður orðið "landsskúlastjórin" broytt til: landsstýrismaðurin".
5) Í § 2, stk. 3 verður orðið "Landsskúlaforsitingini" broytt til: "landsstýrismanninum".

§ 15.

Í løgtingslóg nr. 50 frá 28. apríl 1992 um maskinmeistaraútbúgving og aðrar maskin- og eftøkniútbúgvingar verða gjørdar hesar broytingar:
1) Í § 1 verður orðið "Landsstýrinum" broytt til: "Landsstýrismanninum".
2) Í § 2 verður orðið "Landsstýrið" broytt til: "Landsstýrismaðurin".
3) Í § 3, stk. 3, verður orðið "Landsskúlaforsitingini" broytt til: "landsstýrismanninum".
4) Í § 5, stk. 1 og 3 verður orðið "Landsskúlastjórin" broytt til: "Landsstýrismaðurin".
5) Í § 5, stk. 3 verður orðið "landsskúlastjórin" broytt til: "landsstýrismaðurin".

§ 16.

Í løgtingslóg nr. 62 frá 9. juni 1988 um ávísar skúlar sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 7 frá 16. januar 1990 verða gjørdar hesar broytingar:
1) Í § 1, stk. 1 og 2, § 2, stk. 1 og 2 og § 3 verður orðið "Landsstýrinum" broytt til: "Landsstýrismanninum".

§ 17.

Í løgtingslóg nr. 51 frá 28. apríl 1992 um kavaravinnu verða gjørdar hesar broytingar:
1) Í § 3, stk. 1 og 4, § 5, stk. 1, § 9, § 13, stk. 1 og 2 og § 15, stk. 1 og stk. 2 verður orðið "Landsstýrið" broytt til: "Landsstýrismaðurin".
2) Í § 4, stk. 1, pkt. 2 og 4, § 6, stk. 1 og 3, § 11, stk. 1 og § 15, stk. 1 verður orðið "landsstýrinum" broytt til: "landsstýrismanninum".
3) Í § 15, stk. 1 í seinna setningínum verður orðið

"Føroya Landsstýri" broytt til: "landsstýrismannin-
um".

§ 18.

Henda lóg fær gildi 29. juli 1996, og samstundis verður allur danski teksturin í lógunum strikaður.

Viðmerkingar:

Í sambandi við nýggju stýrisskipanarlógina - løgtingslóg nr. 193 frá 26. juli 1994 um stýrisskipan fyri Føroyar - skal landsstýrið, sum higartil hevur verið eitt kollegialt stýri, verða skipað sum eitt ráðharrastýri frá 29. juli 1996.

Frá nevnda degi er neyðugt at broyta løgtingslógirnar, sum eru um undirvísing, so at samsvar verður millum stýrisskipanarlógina og ymiskar løgtingslógirnar um undirvísing.

Viðmerkingar til tær einstøku lógargreinirnar:

Ad. § 1. Tað verður m.a. ásett, at ábyrgdin verður flutt frá Landsskúlaráðnum, Landsskúlafyrisitingini og landsstýrinum til landsstýrismannin. Harumframt verður ásett, at landskassin og ikki skúlafyrisitingin ber útreiðslurnar av læraralønum, ið standast av at undirvísa næmingum, sum ígjøgnum longri tí vegna smittuvanda ella fyri heilsu og velferð ikki kunnu verða undirvístir í skúlunum, men mugu verða undirvístir heima ella á tí stovni, har teir eru staddir. Áður hava omanfyri nevndar útreiðslur verið býttar millum statskassan og landskassan. Tað verður nú við atliti at heildarveitingini úr statskassasnum til m.a. undirvísingarmál ásett í § 29, stk. 3, at landskassin ber útreiðslurnar til læraralønir og kostnaðin av undirvísingartilfari í tann mun, stovnurin sjálvur ikki letur tilfarið. Tí verður ásett, at seinasti setningurin í § 29. stk. 3 verður strikaður.

Ad. § 2. Tað verður ásett, at ábyrgdin verður flutt frá landsstýrinum til landsstýrismannin.

Ad. § 3. Tað verður ásett, at ábyrgdin verður flutt frá Føroya Landsstýri, landsstýrinum, Landsskúlaráðnum og Landsskúlafyrisitingini til landsstýrismannin.

Ad. § 4. Somu viðmerkingar sum til § 3.

Ad. § 5. Umframt somu viðmerkingar sum til § 3 verður ábyrgdin flutt frá landsskúlastjóranum til landsstýrismannin.

Ad. § 6. Somu viðmerkingar sum til § 5.

Ad. § 7. Tað verður ásett, at ábyrgdin verður flutt frá landsstýrinum og landsskúlastjóranum til landsstýrismannin.

Ad. § 8. Tað verður m.a. ásett, at ábyrgdin verður flutt frá landsstýrinum, Landsskúlafyrisitingini og landsskúlastjóranum til landsstýrismannin. Harumframt verður ásett í § 10, at ísetningin fyri, at "Skúlamyndugleikarnir seta og loysa..." verður ásett, at "landsstýrismaðurin setir og loysir....".

Ad. § 9. Tað verður ásett, at ábyrgdin verður flutt frá landsstýrinum, Landsskúlaráðnum og læruráðnum til landsstýrismannin.

Ad. § 10. Tað verður ásett, at ábyrgdin verður flutt frá landsstýrinum, Landsskúlaráðnum og Landsskúlafyrisitingini til landsstýrismannin.

Ad. § 11. Tað verður m.a. ásett, at ábyrgdin verður flutt frá landsstýrinum til landsstýrismannin, og at ásetingin í kapitli 5, (§ 21), um eitt vinnuskúlaráð verður strikað.

Ad. § 12.
Tað verður ásett, at ábyrgdin verður flutt frá landsstýrinum og Landsskúlaráðnum til landsstýrismannin.

Ad. § 13. Tað verður ásett, at ábyrdin verður flutt frá landsstýrinum, Landsskúlafyrisitingini og landsskúlastjóranum til landsstýrismannin.

Ad. § 14. Somu viðmerkingar sum til § 13.

Ad. § 15. Somu viðmerkingar sum til § 12.

Ad. § 16. Somu viðmerkingar sum til § 12. Tað verður ásett, at ábyrgdin verður flutt frá Føroya Landsstýri og landsstýrinum til landsstýrismannin.

Ad. § 17. Skotið verður upp, at broytingarnar í §§ 1-17, sum verða gjørdar við ætlati at nýggju stýrisskipanini, fáa gildi frá 29. juli 1996, og at danski teksturin í lógunum verður strikaður.

1. viðgerð 15. apríl 1996. Málið varð beint í mentanarnevndina, sum 26. apríl 1996 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 25. mars 1996 og eftir 1. viðgerð tann 15. apríl 1996 beint í mentannarnevndina.

Orsakað av nýggjari stýrisskipanarlóg er neyðugt at gera broytingar í ávísum skúlalógum m.a. lóg um hægri fyrireikingarprøvtøku.

Nevndin hevur viðgjørt málið og tekur **ein samd nevnd** undir við uppskoti landsstýrisins og mælir tinginum til at samtykkja tað.

2. viðgerð 29. apríl 1996. Samtykt við 24-0-0 atkvøðum at beina málið til 3. viðgerð.

3. viðgerð 8. mai 1996. Málið endaliga samtykt við 22-0-0 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 67, 20. mai 1996.

F.L. j.nr. 2100-11/96.

65 Broyting í løgtingslóg um skúlafyrisiting

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, fram soljáðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skúlafyrisiting.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 58 frá 2. oktober 1978 um skúlafyrisiting sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 164 frá 22. desember 1995 verða gjørdar hesar broytingar:

1) "Kapittul 1 (§§ 1-6), Kapittul 3 (§§ 17-20) og Kapittul 9 (§§ 37-41) verða strikað saman við § 34, stk. 1 og 2 í Kapitli 8.

2) Í § 7, stk. 4 verða orðini "landsstýrið eftir tilmæli frá Landsskúlaráðnum" broytt til: "landsstýrismaðurin".

3) Í § 9, stk. 7, § 10, stk. 9, § 22, stk. 1, § 25, stk. 3 og 6 í seinasta setningi og § 27, stk. 2 verður orðið "skúlafyrisitingini" broytt til: "landsstýrismanninum".

4) Í § 22, stk. 4, § 25, stk. 6 í fyrsta setningi og § 30, stk. 1 verður orðið "skúlafyrisitingina" broytt til: "landsstýrismannin"

5) Í § 8, stk. 3, § 22, stk. 2, § 28, stk. 1, § 29, stk. 5 og § 30, stk. 2 verður orðið "Landsskúlaráðið" broytt til: "Landsstýrismaðurin".

6) Í § 25, stk. 1 og 2 og § 32 verður orðið "landsskúlaráðið" broytt til: "landsstýrismannin".

7) Í § 9, stk. 5, § 11, stk. 2, § 19, § 23, stk. 1, 2 og 3, § 27, stk. 1 og 2 í seinasta setningi, § 28, stk. 4, § 29, stk. 6 og § 31, stk. 1 verður orðið "landsskúlaráðnum" broytt til: "landsstýrismanninum".

8) Í § 22, stk. 3 og § 25, stk. 5 verður orðið "landsstýrinum" broytt til: "landsstýrismanninum".

9) Í § 25, stk. 3, § 29, stk. 4 og § 30, stk. 1 verður orðið "skúlafyrisitingin" broytt til: "landsstýrismaðurin".

10) Í § 33 verða orðini "landsskúlaráðið ella" strikað.

11) Í § 36 verða orðini "landsstýrið eftir ábeiðan frá landsskúlaráðnum" broytt til: "landsstýrismaðurin".

§ 2.

Henda lóg fær gildi 29. juli 1996, og samstundis verður allur danski teksturin í lógini strikaður.

Viðmerkingar:

Í sambandi við nýggju stýrisskipanarlógina - løgtingslóg nr. 193 frá 26. juli 1994 um stýrisskipan fyri Føroyar - skal landsstýrið, sum higartil hevur verið eitt kollegialt stýri, verða skipað sum eitt ráðharrastýri frá 29. juli 1996.

Frá nevnda degi má løgtingslógin um skúlafyrisiting verða broytt, so at samsvar verða millum stýrisskipanarlógina og løgtingslógina um skúlafyrisiting.

<u>Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:</u>

<u>Ad. § 1, pkt. 1.</u> Ásetingin í hesum punkti er ein avleiðing av, at landsstýrismaðurin við ráðharrastýrinum, sum kemur í gildi 29. juli 1996, einsamallur fær ábyrgdina av teirri hægru fyrisitingini av skúlaskapinum í Føroyum.

Av tí at ásetingarnar í kapitli 3 um frítíðarundirvísingina standa í løgtingslógini um frítíðarundirvising, verður skotið upp, at tær verða strikaðar her. Tað verður eisini skotið upp, at kapittul 9 um fremjingar og fyribilsreglur verður strikað. Harumframt verður skotið upp, at reglurnar í § 34 um val av landsskúlaráðslimum, og nær ráðið byrjar sítt virksemi, verða strikaðar.

Ad. § 1, pkt. 2 - 11. Tað verður ásett, at ábyrgdin verður flutt frá landsstýrinum, Landsskúlaráðnum, skúlafyrisitingini til landsstýrismannin.

Ad. § 2. Skotið verður upp, at broytingarnar í § 1, sum er ein avleiðing av nýggju stýrisskipanini við ráðharraábyrgd, fáa gildi frá 29. juli 1996, og at danski teksturin í lógini verður strikaður.

1. viðgerð 15. apríl 1996. Málið varð beint í mentannarnevndina, sum 30. apríl 1996 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 25. mars 1996 og eftir 1. viðgerð tann 15. apríl 1996 beint í mentannarnevndina.

Nevndin hartnast um, at landsstýrið ikki er komið longri við fyrireikingunum í samband við, at vit nú fáa eitt "ráðharrastýri". Í samband við tingmálið um broyting í skúlafyrisiting er galdandi lóg í gildi til og við 31. juli 1996, tá nýggja lógin tekur við. Mentannarnevndin og harvið alt løgtingið veit so at siga einki um, hvør skipanin verður á skúlaøkinum eftir 31. juli í ár. Men harafturímóti mugu vit ásanna, at nýggja stýrisskipanin tá kemur í gildi, og er tí neyðugt at taka undir við broytingaruppskotunum innan skúlafyrisiting.

Mentannarnevndin heldur seg tí vera noydda at taka undir við uppskoti landsstýrisins og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskotið

Undir viðgerðini kom fram, at ein villa var í viðmerkingunum hjá landsstýrinum, har ið stendur "løgtingslóg nr. 193" skal standa " løgtingslóg nr. 103" nakrar villur vóru í uppskoti landsstýrisins og setir nevndin tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

1) § 1, 3 pkt. verður soljóðandi: Í § 9, stk. 7, § 10 stk. 9, § 22, stk. 1, § 23, stk. 3, § 25, stk. 3 og 6 í seinasta setningi og § 27, stk. 2 verður orðið "skúlafyrisitingini" broytt til : "landsstýrismanninum".

2) § 1, pkt. 7 verður soljóðandi: Í § 9, stk. 5, § 10, stk. 5, § 11, stk. 2, § 23, stk. 1, 2 og 3, § 27, stk. 1 og 2 í seinassta setningi, § 28, stk. 4, § 31, stk. 1 verður orðið "landsskúlaráðnum" broytt til : "landsstýrismanninum".

3) § 1, pkt 8 verður soljóðandi: Í § 22, stk. 3 og § 25, stk. 5, § 29, stk. 6, verður orðið "landsstýrinum" broytt til : "landsstýrismanninum".

4) § 1, pkt. 9 verður soljóðandi: Í § 25, stk. 4, § 29 stk. 4 og § 30, stk. 1 verður orðið "skúlafyrisitingin" broytt til: "landsstýrismaðurin".

2. viðgerð 7. mai 1996. Broytingaruppskot nevndarinnar samtykt við 25-0-0 atkvøðum. Samtykt við 25-0-0 atkvøðum at beina málið soleiðis broytt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 14. mai 1996. Málið endaliga samtykt við 23-4-0 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 55, 20. mai 1996.

F.L. j.nr. 2100-6/92.

66 Broyting í løgtingslóg um studentaskúlar v.m.

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, fram setjóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um studentaskúlar v.m.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 106 frá 29. juni 1995 um studentaskúlar v.m. verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1 verður "landsstýrinum" broytt til "landinum".
2) Í § 14, stk. 1 verður "landsstýrið" broytt til "landið".
3) Í § 2, stk. 3, § 4, § 5, stk. 1, 4, 6, 7, 8, 10 og 11, § 6, stk. 1 og 2, § 7, § 8, stk. 2 og 4, § 13, stk. 2 og 5, § 16 og § 17, stk. 1 og 2 verður "landsstýrið" broytt til "landsstýrismaðurin".
4) Í § 2, stk. 4, § 3, § 5, stk. 9, § 11, § 12, stk. 1, § 13, stk. 4, § 15, stk. 3 og § 19 verður "Skúlafyrisitingin" broytt til "landsstýrismaðurin".
5) Í § 6, stk. 2 og § 18, stk. 1 verður "Skúlafyrisitingina" broytt til "landsstýrismannin".
6) Í § 13, stk. 6 verður "Skúlafyrisitingini" broytt til "landsstýrismanninum".
7) Í § 13, stk. 1 verður "Landsskúlaráðið" broytt til "landsstýrismaðurin".
8) § 9 verður orðað soleiðis:
   "Landsstýrismaðurin hevur hægstu ábyrgd av undirvísing og prøvtøku á studentaskúlunum. Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann sambæt stk. 1 krevja allar upplýsingar viðvíkjandi skúlunum, heruppí eisini stíla fyri vitjan á skúlanum. Stk. 3. Landsstýrismaðurin ásetur reglur fyri innsavning av upplýsingum frá skúlunum."
9) § 10, stk. 1 verður orðað soleiðis:
   "Landsstýrismaðurin setur í starv og loysir úr starvi rektara. Rektarin er dagligi leiðari skúlans og hevur ábyrgdina av virksemi skúlans mótvegis landsstýrismanninum."
10) Í § 5, stk. 2 verður "ámiðstigi" broytt til "á miðstigi".
11) Í § 5, stk. 3 verður "filmis- og sjónvarpskunnleiki" broytt til "filmur og sjónvarp".
12) Í § 13, stk. 3 verða orðini "at hava" strikað.
13) Í § 16 verða orðini "uttan fyri norðurlond" og orðini "styrkurin kann svara til miðalútreiðslurnar fyri ein næming á føroyskum studentaskúla" strikað. "einum" verður broytt til "einari". "altjóðaprógvi" broytt til "altjóða studentsprøvtøka (IB)" og "studentsprógv" broytt til "studentsprøvtøku".
14) Í § 17, stk. 2 verður "studentsprógv" broytt til "studentsprøvtøku".
15) Í § 18, stk. 1 verða orðini "Avgerðin hjá Skúlafyrisitingini kann ikki kærast til hægri fyrisitingarligan myndugleika" strikað.
16) Í § 18, stk. 1 verður "§ 11, stk. 4" broytt til "§ 10, stk. 4".

§ 2.

Henda lóg fær gildi 29. juli 1996. Tó fáa § 1, 10), 11), 12), 13), 14) og 16) gildi dagin eftir, at henda lóg er kunngjørd, og verður samstundis allur danski teksturin í lógini avtikin.

Viðmerkingar:

Í fjør varð nýggj løgtingslóg um studentaskúlar v.m. sett í gildi. Í sambandi við nýggjut stýrisskipanarlógina (løgtingslóg nr. 193 frá 26. juli 1994 um stýrisskipan fyri Føroyar) tar landsstýrið frá at vera eitt kollegialt stýri verður skipað sum ráðharrastýri frá 29. juli 1996, er neyðugt at broyta løgtingslóg um studentaskúlar v.m., so samsvar verður millum stýrisskipanarlógina og lógina um studentaskúlar v.m. Landsstýrið skýtir samstundis upp at gera smærri málsligar broytingar í galdandi lóg.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

ad § 1, 1), 2), 3), 4), 5), 6), 7), 8), 9) og 15). Í hesum punktum verður m.a. ásett, at ábyrgdin verður flutt frá Landsskúlaráðnum og Skúlafyrisitingini til landsstýrismannin, og er hetta í tráð við nýggju stýrisskipanarlógina. Í § 1, 8) er teksturin broyttur, so samsvar er við ordingina í løgtingslógini um skeið til bægri fyrireikingarprøvtøkur v.m.

ad § 1, 10), 11), 12), 13), 14) og 16. Í hesum punktum er talan um málsligar rættingar og tillagingar.

ad § 2. Skotið verður upp, at broytingarnar í § 1, sum hava samband við nýggju stýrisskipanina fáa gildi frá 29. juli 1996, meðan tær málsligu rættingar og tillagingarnar fáa gildi dagin broytt til "§ 10, stk. 4".

1. viðgerð 15. apríl 1996. Málið varð beint í mentanarnevndina, sum 26. apríl 1996 legði fram soljóðandi

Á l i t

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 25. mars 1996 og eftir 1. viðgerð tann 15. apríl 1996 beint í mentannarnevndina.

Orsakað av nýggjari stýrisskipanarlóg er neyðugt at gera broytingar í ávísum skúlalógum m.a. lóg um hægri fyrireikingarprøvtøku.

Nevndin hevur viðgjørt málið og tekur **ein samd nevnd** undir við uppskoti landsstýrisins og mælir tinginum til at samtykkja tað.

2. viðgerð 29. apríl 1996. Samtykt við 26-0-0 atkvøðum at beina málið til 3. viðgerð.

3. viðgerð 8. mai 1996. Málið endaliga samtykt við 24-0-0 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 68, 20. mai 1996.

F.L. jnr. 2102-5/91.

67 Broyting í løgtingslóg um skeið til hægri fyrireikingarprøvtøku v.m.

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skeið til hægri fyrireikingarprøvtøku v.m.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 107 frá 29. juni 1995 um skeið til hægri fyrireikingarprøvtøku v.m. verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 2, stk. 2, § 3, stk. 2 og 3, § 5, stk. 3, § 6, stk. 1, § 7, stk. 1, § 8, stk. 1, § 9, stk. 2, § 14, stk. 1 og 2, § 15, § 19, stk. 1, § 20, stk. 2, § 20, stk. 5, § 22, stk. 5 og § 23 stk. 1 og 2 verður "landsstýrið" broytt til "landsstýrismaðurin".
2) Í § 7, stk. 2 og § 24, stk. 1 verður "skúlafyrisitingina" broytt til "landsstýrismaðurin".
3) Í § 9, stk. 1, § 16, stk. 3, § 17, stk. 1, § 18, stk. 1, § 19, stk. 2 og 3, § 20, stk. 4 og § 22, stk. 3 og 4 verður "skúlafyrisitingin" broytt til landsstýrismaðurin".
4) Í § 16, stk. 1 verður "landsstýrinum" broytt til "landsstýrismanninum".
5) Í § 16, stk. 2 og § 20, stk. 6 verður "landsskúlafyrisitingini" broytt til "landsstýrismanninum".
6) Í § 20 verður "Landsskúlaráðið" broytt til "landsstýrismaðurin".
7) Í § 21, stk. 1 verður "landsstýrið" broytt til "landið".
8) Í § 2, stk. 1 verður "films- og sjón-varpskunnleika" broytt til "filmur og sjónvarp" og aftaná "fimotti," verður "latin,"sett inn.
9) Í § 3, stk. 1 verður "atgongd til hægri framhaldslestur" broytt til "neyðugt grundarlag fyri hægri framhaldslestri".
10) Í § 4, stk. 1 verður "studentaskúlaútbúgving og stakgreinalestur á studentaskúlastigi" broytt til "studenta skúlar v.m.".
11) Í § 7, stk. 2 verður "Avgerðin hjá skúlafyrisitingini kann ikki kærast til hægri fyrisitingarligan myndugleika" strikað.
12) Í § 19, stk. 1 verður ", og skúlafyrisitingin hevur eftirlitið" strikað.
13) Í § 24, stk. 1 verður "§ 17, stk. 3" broytt til "§ 16, stk. 4".
14) Í § 24, stk. 1 verða orðini: "avgerðin hjá Skúlafyrisitingini kann ikki kærast til hægri fyrisitingarligan myndugleika" strikað.

§ 2.

Henda lóg fer gildi 29. juli 1996. Tó fáa § 1, 8), 9), 10) og 13) gildi dagin eftir, at henda lóg er kunngjørd, og verður samstundis allur danski teksturin í lógini avtikin.

Viðmerkingar:

Í fjør varð nýggj løgtingslóg um skeið til hægri fyrireikingarprøvtøkur v.m. sett í gildi. Í sambandi við nýggju stýrisskipanarlógina (løgtingslóg nr. 193 frá 26. juli 1994 um stýrisskipan fyri Føroyar) har landsstýrið frá at vera eitt kollegialt stýri verður skipað sum ráðharrastýri frá 29. juli 1996, er neyðugt at broyta løgtingslóg um skeið til hægri fyrireikingarprøvtøku v.m. so samsvar verður millum stýrisskipanarlógina og lógina um skeið til hægri fyrireikingarprøvtøku v.m. Landsstýrið skýtir samstundis upp at gera smærri málsligar broytingar í galdandi lóg.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

<u>ad § 1, 1), 2), 3), 4), 5), 6), 7), 11), 12) og 13).</u> Í hesum punktum verður m.a. ásett, at ábyrgdin verður flutt frá Landsskúlaráðnum og Skúlafyrisitingini til landsstýrismannin, og er hetta í tráð við nýggju stýrisskipanarlógina.
<u>ad 8), 9), 10) og 13).</u> Í hesum punktum er talan bert um málsligar rettingar og tillagingar.

at § 2. Skotið verður upp, at broytingarnar í § 1, sum hava samband við nýggju stýrisskipanina fáa gildi frá 29. juli 1996, meðan tær málsligu rettingar og tillagingarnar fáa gildi dagin eftir, at henda lógin er kunngjørd.

1. viðgerð 15. apríl 1996. Málið verð beint í mentamarnevndina, sum 26. apríl 1996 legði fram søljódandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 25. mars 1996 og eftir 1. viðgerð tann 15. apríl 1996 beint í mentamarnevndina.

Orsakað av nýggjari stýrisskipanarlóg er neyðugt at gera broytingar í ávísum skúlalógum m.a. lóg um hægri fyrireikingarprógvtøku.

Nevndin hevur viðgjørt málið og tekur **eina samd nevnd** undir við uppskoti landsstýrisins og mælir tinginum til at samtykkja tað.

2. viðgerð 29. apríl 1996. Samtykt við 25-0-0 atkvøðum at beina málið til 3. viðgerð.

3. viðgerð 8. mai 1996. Málið endaliga samtykt við 23-0-0 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 69, 20. mai 1996.

F.L. j.nr. 2106-1/94.

68 Løgtingslóg um granskingarráð

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, fram søljódandi

Uppskot

til

løgtingslóg um granskingarráð.

§ 1. Landsstýrismaðurin í granskingarmálum setur á stovn granskingarráð til fram fyri føroyska gransking.
Stk. 2. Navn ráðsins er Granskingarráð Føroya.
Stk. 3. Virksemi granskingarráðsins fevnir um náttúruvísindi, teknisk vísindi, fiski- vinnu-, landbúnaðar- og umhvørvisvísindi, samfelagsvísindi, lugvísindi og lekna fræðilig vísindi.

§ 2. Granskingarráðið hevur hesar uppgávur:
at ráðgeva landsstýri og løgtingi í granskingarpolitiskum spurningum.
at fylgja við menningini innan føroyska og millumtjóða gransking - og gera kanningar og uppskot undan politiskari stóðutaka,
at seta fram sjónarmið, tá granskingartiltøk skulu leggjast til rættis og samskipast, og tá almennar játtanir skulu gerast við granskingarendamálum fyri eyga,
at ráðgeva í sambandi við fyrireiking og skipan av granskingarloggávu,
at ráðgeva í spurningum um, hvussu gransking kann gerast gagnlig fyri samfel- agið - bæði á

almenna og privata økinum,
at taka stig til uppskot um loysn av aktuellum granskingarpolitiskum spurningum og evnum,
at ráðgeva í sambandi við gagnnýtslu av granskingarúrslitum og útbúgving av granskarum
at viðgera umsóknir um granskingarstuðul og at geva landsstýrinum filmæli til, hvørjum eigur at verða latin granskingarstuðul av tí peningi, ið settur er av til endamálið á løgtingsfíggjarlógini.

§ 3. Granskingarráðið er sett saman av einum formanni og 6 limum, sum eru tilnevndir av landsstýrismanninum í granskingarmálum út frá persóttligu eginleikum teirra.
Stk. 2. Limirnir í ráðnum skulu vera granskarar ella granskingarkønir, og skulu so vítt gjørligt umboða ymisku granskingarøkini í landinum. Í minsta lagi helmingurin av limunum skal vera virknir granskarar.
Stk. 3. Formaðurin og limirnir í ráðnum verða tilnevndir fyri 4 ár í senn og kunnusita meira enn eitt skeið.

§ 4. Granskingarráðið ger sjálvt fundarskipan sína, sum skal góðkennast av landsstýrismanninum í granskingarmálum.

§ 5. Landsstýrismaðurin í granskingarmálum kann áseta nærri reglur um virksemi granskingarráðsins.

§ 6. Henda lóg kemur í gildi 29. juli 1996.

Viðmerkingar:

Sum er, hava vit einki granskingarráð í Føroyum. Gransking, harafturímóti, á ymiskum vísindaligum økjum er als einki nýtt fyribrigdi, og tað er ein sannroynd, at mangir føroyskir granskarar eru kendir, her eins og í útlondum, fyri vísindalig og faklig úrslit á høgum støði.
Í øðrum londum er kend tann skipan at hava eitt yvirskipað granskingarráð, og undir hesum ávist tal av granskingarráðum fyri tey ymisku vísinda- og granskingarøkini, sum t.d. náttúruvísindi, hugvísindi o.a.

Í Føroyum er helst ikki neyðugt at hava meira enn eitt granskingarráð, hvørs virksemi í høvuðsheitum kann fevna um granskingarpolitiska ráðgeving og nærri ásett virksemi í sambandi við tey ymisku granskingarøkini.

Virkisøkið hjá granskingarráðnum skal fevna um: náttúruvísindi, teknisk vísindi, læknavísindi, fiskivinnu, landbúnað og umhvørvi, hugvísindi og samfelagsvísindi; men ein av teimum mest týðandi uppgávunum verður at ráðgeva landsstýrismannin- um í granskingarmálum, øðrum politiskum og almennum myndugleikum og stovn- um, eins og privatu vinnuni, í granskingarmálum. Eisini skal granskingarráðið fylgja við í menningini innan føroyska og miðluntjóða gransking - og gera tilmæli til, hvussu føroysk gransking skal stuðlast.

Granskingarráðið skal taka stig til at stuðla týðandi granskingaruppgávum og virka fyri at samskipa granskingartiltøk. Í lógartekstinum er ásett, at granskingarráðið er sett saman av einum formanni og 6 limum, sum skulu tilnevnast av landsstýrismann- inum í granskingarmálum út frá persónligu eginleikum, altso fakligu førleikum, teirra.

Granskingarráðið skal ráðgeva landsstýri og løgtingi í granskingarmálum og virka fyri og seta fram uppskot um menning og gagnnýtslu av føroyskari gransking. Eisini kann granskingarráðið seta fram áskoðan sína í sambandi við játtan til gransking- arendamál í uppskoti til árligu løgtingsfíggjarlógina.

Landsstýrismaðurin hevur tørv á einum hægri stovni við fakligum innihaldi, sum er fyrir at vera ráðgevandi, tá tað snýr seg um, hvønn týðning granskingin hevur fyri menningina av føroyska samfelagnum í rúmari merking, og sum kann hjálpa til, tá tað snýr seg um samskipan og ráðfesting av samlaða granskingartilfeinginum.

Gransking í Føroyum skal gagnnýtast í størri mun enn higartil. Í lítla nýtist tó ikki at merkja, at innihaldið í granskingini sum so skal broytast; men tey fólk, sum fáast við gransking mega leggja dent á, at granskingarúrslitini skulu gerast nýtilig fyri føroyska samfelagið - eitt nú vinnulívið. Í hesum sambandi mega bæði grundgransking og tann vinnuliga gransking styrkjast.
Gransking her í landinum skal í neyðugan mun samskipast við gransking í øðrum londum - fyrst í Norð-

urlondum og síðani í EU. Føroyskum granskarum skal tryggjast møguleiki fyri at hava neyðugt samstarv við starvsfelagar í øðrum londum, og teir skulu kunna taka lut í granskingarætlanum, sum eru felags fyri fleiri lond. Í hesum sambandi skal upplýsast um stuðulsmøguleikar í Norðurlondum og EU.

Hetta, at seta á stovn granskingarráð, er ein nýggj skipan í Føroyum, og tí er eingin lóggáva til undan hesum lógaruppskoti. Hugt hevur verið at, hvussu granskingarráð eru skipað uttanfyri Føroyar, tó mest at lógartilfari frá danska granskingarmálaráðin um. Hetta lógaruppskot um granskingarráð er tó einfaldari enn eitt nú tann danska skipanin hesum viðvíkjandi. Miðað hevur verið ímóti at gera skipanina so einfalda sum gjørligt, samstundis sum dentur hevur verið lagdur á at gera uppskot til eitt ráð, sum bóskar til viðurskiftini í Føroyum.

Tiltakið byrjaði við, at landsstýrismaðurin í granskingarmálum skipaði fyri fundi í Tinganesi 15. januar 1996. Á fundinum vóru umboð fyri Fróðskaparsetrið, Náttúrugripasavnið, Fiskirannsóknarstovuna, Undirvísingar- og mentamáladeildina hjá landsstýrismanninum, Heilsufrøðiligu starvsstovuna, Fornminnissavnið, Landsskjalasavnið, Deildina fyri arbeiðs- og almannaheilsu og Landsbókasavnið.

Síðani varð uppskot um granskingarráð tilevnað á Undirvísingar- og mentamála- deildini og sent til omanfyrinevndu stovnar til viðmerkingar. Flestu av stovnunum hava svarað aftur, og verandi uppskot er skrivað við atliti at nevndu viðmerkingum.

Eitt granskingarráð í tí sniði, sum her er skotið upp, kann ikki leggja stórvegis arbeiðsbyrðar á fyrisitingina, og útreiðslurnar til rakstur av ráðnum fara at vera avmarkaðar.

Tó verður neyðugt við einum skrivara, sum kann verða knýttur at skrivstovuni á Fróðskaparsetrinum. Hertil kemur so tann peningaupphædd, sum løgtingið framyvir játtar á árligu løgtingsfíggjarlógini til granskingarendamál. Á løgtingsfíggjarlógini fyri 1996 er avsett 1 mió. kr. til gransking, og sum framgongur av viðmerkingunum til løgtingsfíggjarlógina, er hesin peningur bundin at ítøkiligum granskingartiltøkum.

Viðmerkingarnar, sum sendar eru landsstýrinum frá omanfyrinevndu stovnum, vísa, at mong leggja dent á, at granskingarráðið skal umsita pening ella mæla landsstýrinum til, hvussu peningaupphæddir skulu tillutast granskingarætlanum.

Eitt granskingarráð í tí sniði, sum her er skotið upp, kann ikki leggja stórvegis arbeiðsbyrðar á landsfyrisitingina. Ætlanin er ikki, at ráðið skal vera partur av verandi Undirvísingar- og mentamáladeildini á Landsskrivstovuni. Talan er um eitt ráð, sum er sett saman av serkønum fólki, sum hevur innlit í granskingarviðurskifti. Tað er mest nærliggjandi at hugsa sær, at ein stórur partur av ráðslimunum verður fólk í almennum starvi í føroyskum stovnum. Hetta avmarkar í sjálvum sær útreiðslurnar til fundarpening.

Í tann mun, landsstýrismaðurin velur at tilnevna ráðslimir úr t.d. vinnulívinum, kann fundarpeningur veitast eftir galdandi reglum.

Tað verður neyðugt, at ein skrivari verður settur at avgreiða vanligt skrivstovuvirksemi o.t. Her verður hugsað um skrivstovufólk, lønt eftir sáttmála við Starvsmannafelagið. Hetta skrivstovufólk kann sita á skrivstovuni hjá Fróðskaparsetrinum. Lønarútreiðslurnar til eitt fólk í fullum starvi verða uml. kr. 200.000,00 um árið

Hertil kemur so tann peningaupphædd, sum løgtingið framyvir játtar á árligu løgtingsfíggjarlógini til granskingarendamál. Á løgtingsfíggjarlógini fyri 1996 er avsett 1 mió. kr. til gransking, og sum framgongur av viðmerkingunum til løgtingsfíggjarlógina, er hesin peningur bundin at ítøkiligum granskingartiltøkum.

Viðmerkingarnar, sum sendar eru landsstýrinum frá omanfyri nevndu stovnum, vísa, at mong leggja dent á at granskingarráðið skal umsita pening ella mæla landssýrinum til, hvussu peningaupphæddir skulu tillutast granskingarætlanum. Landstýrismaðurin ger uppskot um hesa peningaupphædd til granskingarendamál í samband við árligu fíggjarlógarviðgerðina. Løgtingið ásetur, hvussu stór upphæddin skal vera.

Viðmerkingar, sum eru sendar Undirvísingar- og mentamáladeildini í samband við málsviðgerðina, eru fjálagdar.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

ad § 1, stk. 1. Í sambandi við, at farið verður frá kollegialari skipan til ráðharraskipan 29. juli í ár, verður skotið upp, at tað verður landsstýrismaðurin í granskingarmálum, sum setur granskingarráðið á stovn.

ad stk. 2. Skotið verður upp, at navn ráðsins verður Granskingarráð Føroya.

ad stk. 3. Í hesum petti er ásett, hvørjar vísindagreinir virksemi ráðsins fevnir um.

ad § 2. Í hesi § eru uppgávur granskingarráðsins útgreinaðar. Hesar uppgávur eru í høvuðsheitum ráðgeving, fyrireiking, samskipan av granskingartiltøkum, savnan av upplýsingum og at gera tilmæli til landsstýrismannin um granskingarstuðul.

ad § 3. Í hesi § er ásett, hvussu ráðið verður sett saman, hvør tilnevnir limirnar, og hvønn førleika limirnir skulu hava.

ad § 4. Útreiðslurnar til rakstur av granskingarráðnum verða játtaðar á árligu lagtingsfíggjarlógini. Vísst verður annars til vanligu viðmerkingarnar.

ad § 5. Í hesi § verður skotið upp at heimila landsstýrismanninum í granskingarmálum at áseta nærri reglur um virksemi granskingarráðsins.
ad § 6. Skotið verður upp, at lógin kemur í gildi 29. juli 1996.

1. viðgerð 16. apríl 1996. Málið varð beint í mentamarnevndina, sum 7. mai 1996 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 25. mars 1996 og eftir 1. viðgerð tann 16. apríl 1996 beint í mentamarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur tá fatan, at útreiðslurnar, ið standast av besum, eru innanfyri tá játtan, sum er á fíggjarlógini, ið er 1 mió. kr. í 1996.

Nevndin heldur at til tess at tryggja, at nýggir granskoðarar fáa hevi til at gerast limir í granskingarráðnum, verður § 3, stk. 3 broytt soleiðis, at formaðurin og limirnir í ráðnum kunnu ikki sita longri enn 2 skeið ísenn.

Samd nevnd setir tí fram hetta

broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

§ 3, stk. 3 verður soljóðandi: "Formaðurin og limirnir í ráðnum kunnu ikki sita longri enn 2 skeið ísenn."

2. viðgerð 9. mai 1996. Broytingaruppskot nevndarinnar samtykt við 20-2-3 atkvøðum. Samtykt við 21-3-5 atkvøðum at beina málið soleiðis broytt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 14. mai 1996. Málið endaliga samtykt við 21-2-6 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 56, 20. mai 1996.

F.L. j.nr. 301-15/95.

69 Lóg um innsetaratrygdargrunn.

Ár 1996, mánadagin 25. mars tegði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot

til

ríkislógartilmæli.

Hennara hátign drotningini verður mælt til, við heimild í § 22 í lóg nr. 367 frá 14. juni 1995 um innsetaratrygdargrunn, at seta lógina í gildi fyri Føroyar við hesum orðaljóði:

"**§ 1.** Innsetaratrygdargrunnurin (grunnurin) er ein privatur, sjálvsognarstovnur, sum skal veita innsetarum eftir teim í § 3, stk. 1, nevndu stovnum fulnað fyri tap av innlánum í sambandi við konkurs.

§ 2. Um Fíggjareftirlitið hevur tikið aftur loyvi hjá einum stovni til at reka virksemi, kann Grunnurin veita pening og veðhald til fulnað av stovnsins ikki afturumsettu ognarum í samband við avtøku av stovninum. Veittur peningur og veðhald skulu ikki vera størri enn tað, sum Grunnurin væntast at missa í møguligum konkursi.
Stk. 2. Grunnurin kann medvirka saman við øðrum.
Stk. 3. Grunnurin kann medvirka, sanna um tað frammanundan er veitt gjaldføristryggd ella ikki.
Stk. 4. Vinnumálaráðharrin ásetur reglur fyri samstarvi millum Fíggjareftirlitið og Grunnin.

§ 3. Lógin umfatar innlán í hesum stovnum:
1. Føroyskum bankum, sparikassum og lutakøssum og føroyskum felløgum umfatað av lóg um ávísar kredittstovnar.
2. Deildir av kredittstovnum heimahoyrandi í landi uttan fyri Europeiska Samveldið, tó ikki londum, sum Samveldið hevur samstarvsavtalur við.

Stk. 2. Fíggjareftirlitið kann áseta reglur um, at deildir sum í teimum í stk. 1, nr. 1, nevndu stovnum í londum uttan fyri Europeiska Samveldið, tó undantikið teimum londum, sum Samveldið hevur gjørt samarbeiðsavtalur við, kunnu sleppa undan at vera umfatað av Grunnimum.

§ 4. Deildir av stovnum frá londum innanfyri Europeiska Samveldið ella londum, sum Samveldið

Det indstilles til hendes majestæt dronningen, med hjemmel i § 22 i lov nr. 367 af 14. juni 1995 om en indskydergarantifond, at sætte loven i kraft for Færøerne i følgende skikkelse:

"**§ 1.** Indskydergarantifonden (Fonden) er en privat, selvejende institution, der skal yde indskydere i de § 3, stk. 1, nævnte institutter dækning for tab på indskud i tilfælde af konkurs.

§ 2. Såfremt Finanstilsynet har inddraget et instituts tilladelse til at drive virksomhed, kan Fonden tilføre midler og stille garantier til dækning af instituttets ikke efterstillede kreditorer i forbindelse med afvikling af instituttet. De tilførte midler og garantier må ikke overstige Fondens skønnede tab ved en eventuel konkurs.
Stk. 2. Fondens medvirken kan ske i fællesskab med andre.
Stk. 3. Fonden kan medvirke, uanset at der forudgående er stillet en likviditetsgarantí.
Stk. 4. Erhvervsministeren fastsætter bestemmelser vedrørende samarbejdet mellem Finanstilsynet og Fonden.

§ 3. Loven omfatter indskud i følgende institutter:
1. Færøske banker, sparekasser og andelskasser samt færøske selskaber omfattet af lov om visse kreditinstitutter.
2. Filialer af kreditinstitutter med hjemsted i et land uden for Den Europæiske Union bortset fra lande, som Unionen har indgået samarbejdsaftale med.

Stk. 2. Finanstilsynet kan fastsætte bestemmelser om, at filialer af de i stk. 1, nr. 1, nævnte institutter i lande uden for Den Europæiske Union bortset fra lande, som Unionen har indgået samarbejdsaftale med, kan undtages fra at være omfattet af Fonden.

§ 4. Filialer af institutter fra lande inden for Den Europæiske Union eller lande, som Unionen har ind-

hevur gjørt samstarvsavtalur við, kunnu koma undir Grunnin sum uppískoyti til innsetaratrygdargrunnar í heimlandinum, um danska skipanin, nevnd í § 5 er betri enn skipanin í heimlandinum. Figgjareftirlitið ásetur gjøllari reglur hesum viðvikjandi.

§ 5. Grunnurin veitir innsetarunum fulnað eftir frádrátti fyri møguligar skyldur í viðkomandi stovni fyri navnaskrásett innlán í stovninum upp til kr. 300.000 fyri hvønn innsetara.

Stk. 2. Grunnurin veitir fullan fulnað fyri hesi innlán:

1) á indekskonti sambært lóg,
2) á kapitaleftirlønarkonti sambært lóg,
3) á sjálvpensioneringskonti sambært lóg,
4) á lutaeftirlønarkonti sambært lóg,
5) á barnauppsparingskonti sambært lóg,
6) á íbúðaruppsparingarsáttmálum sambært lóg,
7) á útbúgvingaruppsparingskonti sambært lóg,
8) á etableringskonti sambært lóg,
9) sum stendur á klientkonti hjá advokatum,
10) sum verða umsitin í góðkendum stovnum, sum sambært lóg um umsiting av fæ hjá ómyndingum v.m. ella §§ 61 og 65 í arvalógini,
11) sum stendur inni á skiftirættarkonto hjá deyðsbúgvum undir almennum skifti, og
12) sum eru latin til varðveitslu sambært deponeringslógini.

Stk. 3. Grunnurin veitir fullan fulnað, smbt. tó pkt. 2 fyri innlán til keypsupphædd fyri fasta ogn, sum innanfyri 9 mánaðir frá innsetanini er latin í varðveitslu eftir frammanundan gjøllari keypsavtalu, og fyri innlán av útgoldnari upphædd frá realkreditláni í sambandi við láni uppá fasta ogn innanfyri 9 mánaðir frá innsetan av upphæddini, við nýbygging tó innanfyri 2 ár. Grunnurin veitir fulnað við frádrátti fyri skyldur, sum hava samband við realkreditlánsmálið ella fastognarhandilin, og møguligar skyldur, sum tað ikki er mótroknað fyri mótvegis tí stovni sambært stk. 1. Tað er ein fortreyt, at fastognin í høvuðsheitum hevur verið brúkt ikki vinnuliga ella í høvuðsheitum er ætlað til ikki vinnuliga nýtslu hjá honum, sum keypur ella seltur ognina, ávíkavist honum, sum hevur upptikið realkreditlánið.

Stk. 4. Grunnurin kann avgera, at eisini aðrir innlánshættir fáa fullan fulnað.

Stk. 5. Grunnurin veitir ikki fulnað fyri innlánum fyri stjórum ella nevndarlimum í kreppurakta stovnum. Lógin umfatar heldur ikki innsetarar, sum eiga 10% ella meira av parta-, ábyrgdar- ella lutapeninginum. Lógin umfatar heldur ikki innlán frá øðrum stovnum, aftanásett kapitalinnskot ella innlán, sum stava frá handlum, har dómur er feldur í máli í sambandi við hvítvasking av penguni.

gået samarbejdsaftale med, kan tilslutte sig Fonden som supplement til hjemlandets indskydergarantiordning, hvis den danske ordning som nævnte i § 5 er mere gunstig end hjemlandets ordning. Finanstilsynet fastsætter nærmere bestemmelser herom.

§ 5. Fonden dækker efter fradrag af indskyderens eventuelle forpligtelser over for det pågældende institut navnenoterede indskud i instituttet indtil 300.000 kr. pr. indskyder.

Stk. 2. Fonden dækker fuldt ud indskud

1) på indekskonti i henhold til lov,
2) på kapitalpensionskonti i henhold til lov,
3) på selvpensioneringskonti i henhold til lov,
4) på ratepensionskonti i henhold til lov,
5) på børneopsparingskonti i henhold til lov,
6) på boligopsparingskontrakter i henhold til lov,
7) på uddannelsesopsparingskonti i henhold til lov,
8) på etableringskonti i henhold til lov,
9) der indestår på advokaters klientkonti,
10) der forvaltes i godkendte forvaltningsafdelinger i henhold til lov om umbringelse og bestyrelse af umyndiges midler m.v. eller arvelovens §§ 61 og 65,
11) der indestår på en skifteretskonto vedrørende dødsbo under offentligt skifte, og
12) der er deponeret i henhold til deponeringsloven.

Stk. 3. Fonden dækker fuldt ud, jf. dog stk. 2, indskud af købesum for fast ejendom, der indtil 9 måneder fra indsættelsen er deponeret i henhold til forudgående købsaftale, og indskud af provenu af realkreditlån i forbindelse med belåning af fast ejendom indtil 9 måneder fra indsættelsen af beløbet, ved nybyggeri dog indtil 2 år. Fondens dækning sker med fradrag af forpligtelser, der har relation til realkreditlånesagen eller ejendomshandelen, og eventuelle forpligtelser, der ikke er modregnet over for det pågældende institut i henhold til stk. 1. Det er en forudsætning, at den faste ejendom har været anvendt hovedsagelig ikkeerhvervsmæssigt eller er bestemt til hovedsagelig ikkeerhvervsmæssig anvendelse af køberen eller sælgeren af ejendommen, henholdsvis den, der har optaget realkreditlånet.

Stk. 4. Fonden kan beslutte, at også andre former for indskud dækkes fuldt ud.

Stk. 5. Fonden dækker ikke indskud fra det nødlidende instituts direktører eller bestyrelsesmedlemmer. Loven omfatter endvidere ikke indskydere, der ejer 10% eller mere af aktiegaranti- eller andelskapitalen. Loven omfatter heller ikke indskud fra andre institutter, efterstillede kapitalindskud eller indskud, der hidrører fra transaktioner, i forbindelse med hvilke der er blevet afsagt dom i forbindelse med hvidvaskning af penge.

§ 6. Har fleiri persónar eru skrásettir sum eigarar av konto, inngongur tann partur, sum tilkemur hvørjum einstøkum innsetara, tá tað í § 5, stk. 1 ásetta markið verður útroknað.

§ 7. Innsetarar skulu kunnast um, hvussu nógv veitt verður í fulnað o.a. í teirri innsettaratrygdarskipan, sum stovnurin er undir. Fíggjareftirlitið ásetur gjøllari reglur hesum viðvíkjandi.

§ 8. Grunnurin skal fremja útgjaldingar ella flyting av innlánum til konto í øðrum stovnum so skjótt sum tilber og seinnast 3 mánaðir eftir at gjaldssteðgurin ella konkursurin hendir. Tað er treyt fyri útgjaldi, at talan er um neyðugu eftirroynd krav. Við gjaldssteðg kemur grunsins skylda ikki í gildi fyrr enn 7 bankadagar eftir fráboðan um gjaldssteðg.
Stk. 2. Fíggjareftirlitið kann eftir umbøn frá grunninum leingja ta í stk. 1, pkt. 1 nevndu freist, tó í mesta lagi við 9 mánaðum.
Stk. 3. Grunnurin kann ikki við tilvísing til ta í stk. 1 og 2 nevndu freist nokta fyri at útgjalda fulnað til innsetara, sum ikki hevur verið førur fyri at gera vart við sín rætt rettstundis til at fáa upphæddina útgoldnað.
Stk. 4. Fíggjareftirlitið ásetur gjøllari reglur um grunsins skyldur til at geva upplýsingar, tá ein stovnur fer í gjaldssteðg ella konkurs, og um hvussu innsetarar skulu boða frá krøvum til Grunnin.

§ 9. Grunnurin yvirtekur í tann mun hann hevur veitt fulnað, innsetarans krøv móti stovninum, sum er í gjaldssteðgi ella er farin konkurs.

§ 10. Eftir samráðing við Danmarks Nationalbank ásetur Fíggjareftirlitið reglur um fíggjarstyrk frá stovnunum til Grunnin. Styrkurin skal veitast sum inngjalding ella ábyrgd.
Stk. 2. Samlaði fíggjarstyrkurin kann árliga í mesta lagi vera ein upphædd sum svarar til 2 promillu av samlaðu innlánunum í stovnunum. Styrkurin frá tí einstaka stovninum verður roknaður av teimum nettoinnlánunum, sum fulnaður er fyri.
Stk. 3. Vinnumálaráðharrin kann við undirtøku frá fíggjarnevndini veita trygd fyri lánum, sum Grunnurin upptekur til at halda sínar skyldur.

§ 11. Grunnurin skal boða Fíggjareftirlitinum frá, um stovnur ikki heldur skyldur, sum áliggja honum sum limur í innsetaratrygarloysnini. Um stovnsdeild er undir innsetaratrygdarskipanini, smbr. § 4, boðar Fíggjareftirlitið málførum myndugleika frá í tí landi, har stovnsdeildin hoyrir heima.
Stk. 2. Fíggjareftirlitið kann taka aftur loyvi frá

§ 6. Hvor flere personer er noteret som indehavere af en konto, indgår den andel, der tilkommer hver enkelt indskyder, ved beregningen af den i § 5, stk. 1, fastsatte grænse.

§ 7. Indskyderne skal have oplysning om dækningsomfanget m.v. for den indskudsgarantiordning, som institutet er tilsluttet. Finanstilsynet fastsætter nærmere bestemmelser herom.

§ 8. Udbetalinger fra Fonden eller Fondens overførsler af indskud til konti i andre institutter skal finde sted snarest muligt og senest 3 måneder efter betalingsstandsningens eller konkursens indtræden. Det er en betingelse for udbetalingen, at der er tale om behørigt efterprøvede krav. Ved betalingsstandsning indtræder Fondens forpligtelse først 7 bankdage efter, at anmeldelse af betalingsstandsning har fundet sted.
Stk. 2. Finanstilsynet kan efter anmodning fra Fonden forlænge den i stk. 1, 1. pkt, nævnte frist, dog højst med 9 måneder.
Stk. 3. Fonden kan ikke under henvisning til den i stk. 1 og 2 nævnte frist afslå at udbetale dækning til en indskyder, som ikke har været i stand til i tide at påberåbe sig sin ret til at få beløbet udbetalt.
Stk. 4. Finanstilsynet fastsætter nærmere regler om Fondens forpligtelser til at give oplysning om et instituts betalingsstandsning eller konkurs samt om indskyderes anmeldelse af krav til Fonden.

§ 9. Fonden indtræder, i det omfang den har ydet dækning i indskyderens krav mod det indstitut, der er undergivet betalingsstandsning eller trådt i konkurs.

§ 10. Efter forhandling med Danmarks Nationalbank fastsætter Finanstilsynet regler om institutternes bidrag til Fonden. Bidrag skal ske ved indbetaling og garantistillelse.
Stk. 2. Det samlede bidrag kan årligt højst udgøre et beløb svarende til 2 promille af institutternes indlånsmasse. Institutternes individuelle bidrag beregnes på baggrund af institutternes dækkede nettoindlån.
Stk. 3. Erhvervsministeren kan med Finansudvalgets tilslutning stille garanti for lån optaget af Fonden til opfyldelse af dens forpligtelser.

§ 11. Fonden skal underrette Finanstilsynet, hvis et institut ondluder at opfylde de forpligtelser, der påhviler instituttet som medlem af indskydergarantiordningen. Hvis en filial har tilsluttet sig indskydergarantiordningen, jf. § 4, underretter Finanstilsynet de kompetente myndigheder i filialens hjemland.
Stk. 2. Finanstilsynet kan tilbagekalde et instituts

stovni til at reka virksemi, um stovnurin ikki heldur reglurnar í lógini, reglur ásettar eftir lógini ella ásetingum í grunsins viðtøkum.

§ 12. Grunnurin er undir leiðslu av nevnd við 5 limum, sum verða tilnevndir av vinnumálaráðharranum. Limirnir og varalimirnir verða tilnevndir fyri 3 ár.
Stk. 2. Nevndarformaðurin skal umboða tjóðbúskaparligan og roknskaparligan serkunnleika. Næstformaðurin skal umboða løgfrøðisligan serkunnleika. Tveir limir skulu umboða stovnurnar, og ein limur skal umboða innsetararnar.
Stk. 3. Sum formaður ella næstformaður kunnu ikki veljast persónar, sum eru í leiðsluni fyri ella hava sovorðið tilknýtið annars til vinnurekandi felag ella felagsskap, at mótstríðandi áhugi kann koma millum hesi feløg og Grunnin.

§ 13. Viðtøkur grunsins og starvsskipan fyri nevndina skal Fíggjareftirlitið góðkenna.
Stk. 2. Viðtøkurnar skulu hava reglur um ílegging av grunsins fíggjarognum, eins og hvørjir innlánshættir, ið skulu fáa fullan fulnað, sm̀br. § 5. stk. 4. Samtykt um víðkan av innlánshættum, ið skal veitast fulnað fyri, skal vera einmælt.

§ 14. Nevndin kann seta neyðug fólk í starv, og gevur Fíggjareftirlitinum áðrenn 3 mánaðir eftir árslok roknskap fyri farna árið við frágreiðing um virki grunsins.

§ 15. Grunnurin heldur kostnaðin fyri umsiting grunsins.
Stk. 2. Grunnurin rindar eisini fyri eftirlitið, sum staturin hevur smbr. § 16.

§ 16. Fíggjareftirlitið hevur eftirlit við Grunninum. Fíggjareftirlitið og Grunnurin kunnu biðja um allar upplýsingar, sum verða hildnar at vera neyðugar fyri at tryggja, at reglurnar í lógini, reglur ásettar eftir lógini ella ásetingum í grunsins viðtøkum, verða hildnar.

§ 17. Um strangari revsing ikki er uppiburin eftir øðrum lógum, verður hann revsaður við bót, sum
1) gevur skeivar ella villleiðandi upplýsingar ella figur burtur upplýsingar við fráboðan, uppgerð ella útgjalding av fulnaðarkravi ella
2) letur vera við at geva teir upplýsingar, sum eftirlitið ella Grunnurin krevja, smbr. § 16, ella annars geva skeivar ella villleiðandi upplýsingar, sum skulu brúkast í eftirlitinum við Grunnin.

Stk. 2. Somuleiðis verður stovnur, umfattaður av

tilladelse til at drive virksomhed, hvis institutet ikke opfylder lovens regler, regler udstedt i medfør af loven eller bestemmelser i Fondens vedtægter.

§ 12. Fonden ledes af en bestyrelse på 5 medlemmer, der udnævnes af erhvervsministeren. Medlemmerne og stedfortræderen for disse udnævnes for 3 år.
Stk. 2. Bestyrelsens formand skal repræsentere nationaløkonomisk og regnskabsmæssig sagkundskab. Næstformanden skal repræsentere juridisk sagkundskab. To medlemmer skal repræsentere institutterne, og et medlem skal repræsentere indskyderne.
Stk. 3. Som formand eller næstformand kan ikke vælges personer, der deltager i ledelsen af eller i øvrigt har en sådan tilknytning til et selskab eller en organisation, at der vil kunne opstå modsatrettede hensyn mellem disse og Fonden.

§ 13. Fondens vedtægter og bestyrelsens forretningsorden godkendes af Finanstilsynet.
Stk. 2. Vedtægterne skal indeholde bestemmelser om anbringelse af Fondens midler samt om, hvilke for mer for indskud der skal dækkes fuldt ud, jf. § 5, stk. 4. Beslutning om udvidelse af dækningsomfanget træffes ved enstemmighed.

§ 14. Bestyrelsen antager fornøden medhjælp og afgiver inden 3 måneder efter et kalenderårs udløb regnskab for det forløbne år med beretning om Fondens virksomhed til Finanstilsynet.

§ 15. Omkostningerne ved Fondens administration afholdes af Fonden.
Stk. 2. Fonden afholder tillige udgifterne ved statens tilsyn, jf. § 16.

§ 16. Finanstilsynet fører tilsyn med Fonden. Finanstilsynet og Fonden kan af institutter og indskydere forlange alle oplysninger, som skønnes nødvendige for at sikre, at lovens regler, regler udstet i medfør af loven og bestemmelser i Fondens vedtægter, overholdes.

§ 17. For så vidt højere straf ikke er forskyldt efter den øvrige lovgivning, straffes med bøde den, der
1) afgiver urigtige eller vildledende oplysninger eller fortier oplysninger ved anmeldelse, opgørelse eller udbetaling af dækningskrav eller
2) undlader at give de af tilsynet eller Fonden i henhold til § 16 krævede oplysninger eller i øvrigt afgiver urigtige eller vildledende oplysninger til brug for kontrollen med Fonden.

Stk. 2. På samme måde straffes et institut omfattet af loven, der undlader at opfylde de forpligtelser der

lógini, sum ikki heldur skyldurnar, sum áliggja honum, undir innsetaratrygdarskipan, revsaður.

§ 18. Partafeløg, lutafeløg, smápartafeløg og tílík, sum fremja brot, kunnu sum felløg fáa álagt sektarábyrgd. Um kommuna ella kommunalur felagsskapur, sum er umfatað av § 60 í lóg um kommunustýri, fremur lógarbrotið, kunnu kommunan ella kommunali felagsskapurin fáa álagt sektarábyrgd.

§ 19. Reglur givnar við heimild í lógini eru eisini galdandi í Føroyum, eftir at tær eru lagdar fyri Føroya Landsstýri og kunngjørdar í Kunngerðablaðnum.

§ 20. Vinnumálaráðharrin ásetur, smbr. tó stk. 2, nær lógin fær gildi. Samstundis fer úr gildi lóg nr. 850 frá 23. desember 1987 um innsetaratrygdargrunn.
Stk. 2. Uppá ásetingina í § 3 fær lógin til 31. desember 1999 gildi fyri stovnsdeildir her í landinum hjá sponskum og grískum kreditstovnum, sum til 31. desember 1999 eru frítiknir fyri krav um at vera undir innsetaratrygdarskipan í heimlandinum, smbr. grein 12 og skjal 3 í fyriskipan frá EF ráðnum frá 94/19/EF frá 30. mai 1994 um innsetaratrygdarskipan.
Stk. 3. Uppá ásetingina í § 5 skal tann fulnaður, sum verður veittur innsetarum í stovnsdeildum hjá donskum stovnum í londum innanfyri Europa Samveldið ella londum, sum Samveldið hevur gjørt samstarvssáttmála við til 31. desember 1999, ikki fara uppum tann fulnað, sum verður veittur í trygdarskipan í vertslandinum.

påhviler det som tilsluttet en indskudsgarantiordning.

§ 18. For overtrædelser der begås af aktieselskaber, andelsselskaber, anpartsselskaber eller lignende, kan der pålægges selskabet som sådant bødeansvar. Er overtrædelsen begået af en kommune eller et kommunalt fællesskab, der er omfattet af § 60 i lov om kommunernes styrelse, kan der pålægges kommunen eller det kommunale fællesskab bødeansvar.

§ 19. Forskrifter udstedt i medfør af loven gælder også for Færøerne efter forelæggelse for Færøernes Landsstyre og kundgørelse i Kunngerðablaðið.

§ 20. Erhvervsministeren fastsætter, jf. dog stk. 2, tidspunktet for lovens ikrafttræden. Samtidig ophæves lov nr. 850 af 23. desember 1987 om en indskydergarantifond.
Stk. 2. Uanset bestemmelsen i § 3 finder loven indtil 31. december 1999 anvendelse på filialer af spansk og græske kreditinstitutter etableret her i landet, som indtil 31. december 1999 er undtaget fra krav om tilslutning til en indskydergarantiordning i deres hjemland, jf. artikel 12 samt bilag 3 i rådets direktiv af 94/19/EF af 30. maj 1994 om indskudsgarantiordninger.
Stk. 3. Uanset bestemmelsen i § 5 må den dækning, der ydes indskydere i filialer af danske institutter, jf. § 3, etableret i lande inden for Den Europæiske Union eller lande, som Unionen har indgået samarbejdsaftale med, indtil 31. december 1999 ikke overstige den dækning, der tilbydes af garantiordningen i værtslandet.

Viðmerkingar:

Galdandi lóg í Føroyum fyri Innsetaratrygdargrunnin (Indskydergarantifonden) er frá 1987.

1.juni 1995 kom nýggj lóg um Innsetaratrygdargrunnin í gildi í Danmark.

Lógin frá 14. juni 1995 um innsetaratrygdargrunn fremur fyriskipan ES ráðsins (94/19/EF) frá 30. mai 1994 um innsetaratrygdarskipanir við tí endamálið at verja innsetarar í kreditstovnum í gjaldssteðgi ella konkurs. Og eisini at verja kredittstovnar móti, at innsetarar taka sínar pengar úr stovnum, sum koma í trupuleikar ella ógrundað koma í ringt orð.

Tann mest sjónliga broytingin er, at hvør innsetari nú verður tryggjaður við upp til 300.000 kr. móti 250.000 kr. eftir gomlu lógini.

Frá føroyskari sjóu er ynskiligt at eisini verður veittur fullur fulnaður fyri frítíðarpening sum í Føroyum stendur í peningastovnunum. Hetta eru serlig føroysk viðurskifti. Í Danmark verður summfrítíðarpeningurin ikki settur í peningastovnarnar, og hava teir tí ikki henda trupuleikan.

Landsstýrið hevur fyrr vent sær til innsetaratrygdargrunnin við málinum men varð ynski landsstýrisins ikki gingið á møti.

Landsstýrið heldur ikki, at hetta málið eigur at útseta ígyldiskomuna fyri hesi lóg, og skjýtur tí upp fyri tinginum, at lógin um innsetaratrygdargrunnin verður sett í gildi í Føroyum við kongaligari fyriskipan, við teimum broytingum, sum vinnumálaráðið mælir til, við tí fyrivarni, at landsstýrið samstundis tekur stig til, at málið um trygd fyri frítíðarpeningin verður reist yvir fyri vinnumálaráðnum gjøgnum ríkisumboðið.

Broytingarnar, ið vinnumálaráðið mælir til, eru hesar:

Í § 3, nr. 1 verður "føroyskum" sett í staðin fyri "donskum".

§§ 19 og 20 í donsku lógini eru ikki í føroyska lógaruppskotinum.

Nýggj § 19 er gjørd í føroyska lógaruppskotinum, sum sigur, at reglur givnar við heimild í lógini, eru eisini galdandi í Føroyum, eftir at tær eru fagdar fyri Føroya Landsstýri og kunngjørdar í Kunngerðablaðnum. § 21 í donsku lógini verður § 20 í føroyska lógaruppskotinum.

§ 21, stk. 2 og stk. 3 í donsku lógini eru ikki við í føroysku lógini.

Í Danmark er tað lóg nr. 28 frá 14. januar 1994, sum fer úr gildi. Men í Føroyum er lóg nr. 850 frá 23. december 1987 um innsetaratrygdargrunn enn í gildi. Tí er tað henda lóg, sum fer úr gildi í Føroyum, samstundis sum lóg nr. 367 frá 14. juni 1995 um innsetaratrygdargrunn kemur í gildi.

§ 22 í donsku lógini er ikki við í føroyska lógaruppskotinum. Men tað er við heimild í § 22, at mælt verður til at seta lóg nr. 367 frá 14. juni 1995 um innsetaratrygdargrunn í gildi fyri Føroyar.

Hjálagt: Lov nr. 367 af 14. juni 1995 om en indskydergarantifond.

1. viðgerð 10. apríl 1996. Málið varð beint í rettarnevndina, sum 8. mai legði fram saljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 25. mars 1996 og eftir 1. viðgerð tann 10. apríl 1996 beint í rettarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur í hesum sambandi innkallað landsstýrismannin í fíggjarmálum, Jóannes Eidesgaard, til fundar í nevndini. Við honum á fundi vóru eisini embætisfólk av fíggjardeildini í landsstýrinum.

Henda lóg er ein fylgja av, at 1. juni 1995 varð í Danmark sett í gildi nýggj lóg um innsetaratrygdargrunn. Galdandi lóg í Føroyum um innsetaratrygdargrunn er frá 1987. Ætlanin við hesum uppskoti til ríkislógartilmæli er sostatt at seta nýggju lógina í gildi fyri Føroyar. Slíkar innsetaratrygdarskipanir verja innsetarar í kreditstovnum móti gjaldstepdi ella konkurs og verja samstundis kreditstovnarnar fmóti, at innsetararnir taka sín pening út úr stovnum, sum koma í fíggjarligar trupulleikar.

Mest sjónliga broytingin í nýggju lógini er, at hvør innsetari nú verður tryggjaður við upp til 300.000 kr. í móti 250.000 kr. eftir gomlu lógini.

Rættarnevndin hevur serliga viðgjørt spurningin um møguleikan fyri at fáa veitt fullan fulnað fyri frítíðarpeningi, sum stendur í peningastovnum í Føroyum.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur greitt nevndini frá, at landsstýrið hevur havt brævaskifti við Innsetaratrygdargrunnin, og at brævaskifti eisini hevur verið millum Innsetaratrygdargrunnin og Vinnumálaráðið hesum viðvíkjandi. Niðurstøðan er fyribils, at grunnurin ikki heldur seg hava heimild til at veita fulnað fyri frítíðarpeningi, sum stendur í føroyskum peningastovnum.

Annars kann viðmerkjast, at tann nevndin fyri grunnin, sum vísandi til tørvandi heimild ikki hevur viljað gingið hesum serstaka føroyska ynski á møti um eisini at fáa trygd fyri frítíðarpening innistandandi í peningastovnunum, nú er farin frá. Nýggj nevnd er vald fyri grunnin, og hevur hon ikki viðgjørt málið.

Nevndin hevur eisini umrøtt spurningin um, hví § 19 í danskri lógini ikki verður sett í gildi fyri Føroyar. Henda grein snýr seg um broyting í lóg um bankar og sparikassar og áleggur peningastovnum at vísa á, at ávís virðisbrøv, t.e. "obligationer udstedt af pengeinstitutter med status af efterstillet kapital" ikki hava sama trygd sum t.d. statsobligatiónir.

Uppá fyrispurning hevur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum svarað, at hann ikki metir, at bráðneyðugur tørvur er at fremja broytingarnar samb. § 19 í føroyska lógini. Hesin spurningur eigur at verða viðgjørdur fyri sog sjálvan. Broytingarnar samb. § 19 eru nevniliga ikki nøkur fortreyt fyri, at lógin um innsetaratrygdargrunn skal virka eftir ætlan. Landsstýrið mælir sostatt til, at lógin verður sett í gildi uttan omanfyri nevndu broyting.

Vísandi til ta frágreiðing, sum landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur latið rættarnevndini og serliga vísandi til, at henda lógarbroyting veitir innsetarum í peningastovnum betri trygd enn núgaldandi lóg, tekur ein samd nevnd undir við uppskoti landsstýrisins. Nevndin heltir á landsstýrið um skjótast gjørligt at taka upp samráðingar við innsetaratrygdargrunnin viðv. omanfyri nevnda spurningi um frítíðarpening, sum stendur í føroyskum peningastovnum.

Ein samd rættarnevnd mælir við hesum tinginum at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 10. mai 1996. §§ 1-20 samtyktar við 20-0-0. Við 20-0-0 atkvøðum samtykt at beina málið til 3. viðgerð.

3. viðgerð 15. mai 1996. Ríkislógartilmælið endaliga samtykt við 26-0-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 2561-5/91.

70 Broyting í løgtingslóg um vektgjald á motorakførum v.m.

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður fram sjóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vektgjald av motorakførum v.m.
Viðmerkingar:

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 38 frá 31. mars 1982 um vektgjald av motorakførum v.m. við seinni broytingum verður gjørd henda broyting:

Í § 11 verður sum punkt 4) sett:

"4). Akfør og viðfestir vognar uppá 12.000 kg. tolalvekt ella yvir, ið verða skrásett til uttanlandsflutning. Føroya Landsstýri fær heimild at gera nærri reglur fyri nevndu akfør.

§ 2.

Henda lóg fær gildi frá 1. juli 1996

Sum er, rinda øll akfør, har annað ikki er nevnt í løgtingslóg um vektgjald av motorakførum v.m., sum eru skrásett í Føroyum vektgjald og útjavningargjald.

Málið um tað rímiliga í, at akfør sum bert eru í uttanlandsvinnu og tí ikki slíta føroysku vegirnar, eisini rinda vektgjald og útjavningargjald í Føroyum, er reist fyri landsstýrinum.

Seinastu árini hevur lítið arbeiði verið í Føroyum, og onkur bileigari hevur bjarga sær við at koyra í uttanlandsvinnu.

Hesi akfør rinda ymisk avgjøld, har tey koyra, tað er tí ein eyka útreiðsla, um tey eisini skulu rinda avgjald í Føroyum.

Heldur ikki má tað haldast rímuligt, at teir, ið kunnu finna sær ein vinnuveg innan uttanlandsflutning, skulu verða noyddir av landinum at skráseta akførini.

Tí verður skotið upp, at akfør og viðfestir vognar, sum verða skrásettir í Føroyum til uttanlandsflutning, sleppa undan at rinda vektgjald og útjavningargjald.

Sum er, er tað bert heilt fáir, sum reka uttanlands flutningsvinnu burtur av, so hetta er ikki nøkur týðandi útreiðsla fyri landskassan.

1. viðgerð 10. apríl 1996. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 26. apríl 1996 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Føroya Landsstýri tann 25. mars 1996 og varð eftir 1. viðgerð 10. apríl 1996 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið, og **ein samd nevnd** mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 29. apríl 1996. Samtykt við 26-0-0 atkvøðum at beina málið til 3. viðgerð.

3. viðgerð 8. mai 1996. Málið endaliga samtykt við 21-0-0 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 70, 20. mai 1996.

FL. J.nr. 2520-41/95.

71 Broyting í løgtingslóg um toll

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um toll.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 121 frá 23. desember 1991 um toll við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 12 verður stk. 3 sett úr gildi og stk. 4 verður hereftir stk. 3.
2) Millum kap. 7 og kap. 8 verður sum nýtt kap 7 a sett:

"**kap. 7 a: Friøkir og frígoymslur:**

§ 18 a. Sum frígoymsla er at skilja hølir, ið eru á føroyska tolløkinum, og undir eftirliti av Toll- og Skattstovuni, men har ið vørurnar á goymsluni, hvat tolli og avgjøldum viðvíkur, verða mettar at verða uttanfyri føroyska tolløkið.

Stk. 2. Toll- og Skattstova Føroya kann á støðum, har ið serligur tørvur er, geva loyvi til, at sett verður á stovn frígoymsla til almenna nýtslu til at leggja upp vørur frá útlandinum í stytri ella longri tíð, uttan at tollur, mvg ella punktgjald skal rindast fyri tær.

Stk. 3. Vanligu toll- og avgjaldsreglurnar fyri innflutning og tolleftirlit eru galdandi fyri vøruflutning frá frígoymslu og til restina av føroyska tolløkinum. Toll- og Skattstovan kann til vernd av toll- og avgjaldsviðurskiftum og til fremjan av teimum uppgávum, sum annars eru álagdar Toll- og Skattstovuni at røkja, fyriskriva reglur um eftirlit við frígoymslum.

Stk. 4. Persónlig nýtsla av ótolladum vørum, ið eru á frígoymslu er bannað, eins og keyp, móttøka, sølu ella avhendan av nevndu vørum til persónliga nýtslu eisini er bannað.

Stk. 5. Á frígoymslu kunnu, um ikki annað er serliga fyriskrivað, leggjast alt slag av vørum uttan mun til mongd, uppruna, hvørjum landi vøran kemur frá og er ætlað til.

Stk. 6. Landsstýrið kann áseta reglur um í hvønn mun og undir hvørjum treytum høgt tollaðar vørur, sum mugu metast at vera undir serligum vanda fyri at verða smuglaðar, kunnu leggjast upp á frígoymslu.

Stk. 7. Landsstýrið kann áseta neyvari reglur um stovnan, innrettan og nýtslu av frígoymslum, um ábyrgd hjá loyvishavara fyri tolli og avgjøldum, um trygdarstitlan fyri tolli- og avgjøldum av teim vørunum, ið førdar verða á frígoymslu, um afturtøku av loyvum og nær ið loyvið annars fellur burtur.

§ 18 b. Sum friøki er at skilja ávíst øki á føroyska tolløkinum, sum er undir eftirliti av Toll- og Skattstovuni,

men sum, hvat tolli og avgjøldum viðvíkur, verður mett at verða uttan fyri føroyska tolløkið.

Stk. 2. Landsstýrið kann í samráð við Toll- og Skattstovuna geva loyvi til at seta á stovn friøki til almenna nýtslu, og tá ið talan er um íðnaðarvirksemi og serligur tørvur er á tí, geva loyvi til at seta á stovn friøki til privata nýtslu. Landsstýrið ásetur í kunngerð neyvari reglur fyri friøkjum, herundir eisini treytir fyri loyvisgevanini og fyri rakstrinum av friøkjum.

Stk. 3. Vørur, ið verða flutar av friøki inn á føroyska tolløkið, verða roknaðar sum innflutningur, og eru vanligu toll- og avgjaldsreglurnar fyri innflutning at galda eins og reglurnar í kap. 9 um tolleftirlit eisini eru galdandi fyri friøkir.

Stk. 4. Friøkisvirksemi og tey virkir og goymslur, ið eru á friøkinum, koma undir tær reglur, ið ásettar verða av landsstýrinum og Toll- og Skattstovu Føroya um eftirlit til vernd av toll- og avgjaldsáhugamálum og fyri annars at fremja tær uppgávur, ið álagdar eru Toll- og Skattstovuni at røkja. Hesar reglur vera galdandi bæði á markinum við friøkið og á friøkinum.

Stk. 5. Toll- og Skattstova Føroya hevur rætt til allastaðni á einum friøki at kanna flutningsfør og at eftirkanna persónar, tá ið hetta fer fram í samsvar við reglurnar í § 30, stk. 2 og 3.

Stk. 6. Í tann mun Toll- og Skattstovan metir tað neyðugt til útinnan av eftirlitinum við friøki, skal loyvishavari fyri egnan kostnað gera og viðlíkahalda gyrðingar av økinum, og á líknandi hátt stilla høskandi høli á økinum til taks til toll- og skattamyndugleikan, um hetta verður krav.

Stk. 7. Í einum friøki kunnu, um ikki annað er serliga fyriskrivað, goymast vørur av einum og hvørjum slag uttan mun til mongd, uppruna, hvørjum landi vøran kemur frá ella er ætlað til.

Stk. 8. Persónlig nýtsla av vørum í einum frríøki, sum eru fluttar hagar uttan at vera tollgreiddar, fmóti frítøku, ella afturrindan av avgjøldum, er bannað, eins og keyp, móttøka, søla ella avhendan av nevndu vørum til persónliga nýtslu bannað.
Stk. 9. Landsstýrið kann áseta reglur um, í hvønn mun og við hvørjum treytum bøgt tollaðar vørur, sum mugu metast at vera undir serligum vanda fyri at vera smuglaðar, kunnu leggjast á goymslu á frríøki.

Stk. 10. Stovnan av íðnaðarvirksemi kann bert fremjast á frríøki við loyvi frá landsstýrinum. Í slíkum málum skal landsstýrið leita sær ummæli frá Toll- og Skattstovuni áðrenn loyvi verður givið."
3) Í § 33 verður "frríhavnsøki" broytt til "frríøki ella frígoymslu".

§ 2.

Hendan lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar:

Fyriliggjandi uppskot landsstýrsins til broytingar í tolllógini er uppskot um at skapa heimild fyri at seta á stovn frríøkir og frígoymlsur og at skapa meginkarmarnar um hetta virksemi.

Sambæt galdandi tolllóg er meginreglan, at tollur/avgjøld av eini vøru falla til gjaldingau, so skjótt vøran er uppskipað á føroyska tolløkinum, ella á annan hátt komin á føroyska tolløkið.

Til hesa meginreglu eru galdandi undantøk soleiðis, at ávísir innflytarar, ið hava tollkreditt, kunnu fáa vørur tollavgreiddar uttan at gjalda toll samstundis við innflutningin, men eftir galdandi reglum at rinda toll- og avgjøld í seinasta lagi 22. í øðrum mánað eftir innflutningsdagin.

Harumframt kann innflytari leggja vøruna á tollpakkhús, og soleiðis útseta tollgreiðsluna til útflýggjan fer fram úr pakkhúsinum. Avmarkingar eru tó í hesi skipan, soleiðis at vørur í mesta lagi kunnu liggja á pakkhúsi 2 mánaðir frá innflutningsdegnum uttan tollgreiðslu. Tá ið hesir 2 mánaðirnir eru farnir, skulu vørurnar annaðhvørt tollavgreiðast ella endurútflytast.

Vinnan hevur mett, at verandi skipanir eru ov stirvnar og kapitalbindandi, og at tørvur er á øðrum alternativum til hesar skipanir, ið eru meira fleksiblar, so at tær ikki í su stóran mun sum nú stýra innkeypinum hjá einkultu fyritøkuni og skerja teir fyrimunir, ið kunnu vera eitt nú í stórinnkeypi. Eisini er ynski um, at skipan kann setast á stovn, sum hvat viðvíkur útflutningi kann bøta um verandi toll- og avgjaldsbindingar.

Fyri at kanna hesi viðurskifti setti landsstýrið á heysti 1994 nevnd, sum í høvuðsheitum hevði til endamáls at kanna, hvussu ein frríhavn virkar. Í februar 1995 gav nevndin landsstýrinum álit, sum fyriuttan at viðgerða spurningin um frríhavnir, eisini viðgerð onnur alternativ til frríhavnir, so sum frríøkir og frígoymslur og hvussu hesar møguliga heldur enn frríhavnsvirksemi kunnu verða við til at nøkta tørvin, ið vinnan vísur á. Álitið verður hjálagt í sfni heild sum tylgiskjal 1.

Í samráð við sonna nevnd og Toll- og Skattstovuna er landsstýrið komið til, at tørvurin hjá vinnuni kann nøktast við øðrum skipanum enn frríhavnum, sum eru sera kostnaðar- og viðlíkahaldskrevjandi, og hevur landsstýrið tí í fyrstu syftu mett skilabest at seta á stovn frríøkir og frígoymlsur ístaðin.

Út frá hesum hevur landsstýrið gjørt uppskot til broytingar í tolllógini, sum fevna um reglur fyri frríøkir og frígoymslur.

Frríøkir eru økir á føroyska tolløkinum, ið hvat toll- og avgjaldi viðvíkur, so at siga verður líkið úr føroyska tolløkinum, soleiðis at økið í mun til føroysk toll- og avgjaldsviðurskifti verður mett at verða útland við tí avleiðing, at vørur og/ella framleiðsla, ið fer fram á økinum, verður mett at fara fram uttan fyri føroyska tolløkið. Av hesum stendst eisini, at toll- og avgjøld eitt nú ikki skulu gjaldast eftir vanligu reglunum, tá ið vøran kemur inn á frríøkið, men fyrst, tá ið vøran verður flutt frá frríøkinum inn á føroyska tolløkið. Eisini kunnu møgulig avgjøld, ið vanliga verða endurrindað við útflutning eftir hesi skipan longu endurrindast, tá ið vøran fer av føroyska tolløkinum inn á frríøkið.

Frígoymslur eru hølir liggjandi á føroyska tolløkinum, ið tollvaldið heimilar eina serstøðu við at vørur á hesum goymslum kunnu liggja uttan toll- og avgjaldsgreiðslu í stytri ella longri tíð. Skipanin er at meta sum

ein víðkan av verandi skipan við pakkhúsgoymslum, tó soleiðis at verandi goymslur framhaldandi fylgja galdandi skipan og at vørur á frígoymslum í mótseting til vørur undir verandi pakkhússkipan kunnu umpakkast og partklarerast t.v.s. tollavgreiðast í portum.

Út frá hesum skjýtur landsstýrið upp, at seta í gildi heimild fyri at seta á stovn fríøki í høvuðsheiti til almenna nýtslu, men eisini til privata nýtslu, tá ið talan er um íðnaðarvirksemi og serligur tørvur er á at fremja íðnaðin undir hesi serskipan.

Hvat viðvíkur frígoymslum fyrislær landsstýrið, at Toll- og Skattstovan fær heimild til at geva loyvir til frígoymslur, men at hesar goymslur skulu vera til nøktan av tí almenna tørvi, ið er á at hava vørur á goymslu eftir aðrari skipan enn tí verandi við pakkhúsgoymslum.

Frígoymslur og fríøkir eru til almenna nýtslu, men landsstýrið kann loyva privatum at hava fríøki til íðnaðarvirksemi. Landsstýrið skjýtur tó upp, at íðnaðarvirksemi á fríøki bert kann fremjast eftir serligum loyvi frá landsstýrinum, sum áðrenn loyvi verður givið, leitar sær ummæli frá Toll- og Skattstovuni.

Hesar skipanir við frígoymslum og fríøkjum koma at áleggja Toll- og Skattstovuni økt eftirlitsarbeiði afturat verandi arbeiðsuppgávum, hvussu nógv, kemur tó ikki at vísa seg, fyrr enn tað sæst, hvussu umfatandi skipanin gerst.

Við hesum verður skotið upp at broyta galdandi § 12 og at seta í gildi nýggjar §§ 18 a og 18 b.

Verandi § 12 verður broytt, so at galdandi heimild til á stovnsetan av frígoymslu verður flutt til nýggju § 18 a, sum verður skotin upp í lógaruppskotinum.

§ 18 a viðger umráðið við frígoymslum sum omanfyri frágreitt, meðan § 18 b viðgerð fyriskipaninar fyri fríøki, og verður í báðum førum heimild sett til deils landsstýrið og deils Toll- og Skattstovuna at fyriskriva neyvari reglur fyri skipaninum og fyri tí neyðuga eftirliti við hesum.

Hvør fíggjarligur kostnaður stendst av uppskotinum er ógvuliga ringt at meta um.

Hvat fløgum viðvíkur, er tað ikki landskassin, ið ber útreiðslurnar. Í uppskotinum er lagt upp til, at verandi fløgur eiga at verða nýttar, og tað merkir, at tey hús og bygningar, havnaøkir og egnað økir annars, sum eru tøk í dag, eiga at verða nýtt. Í byrjanini skuldi ið hvussu er ikki verið neyðugt at gjørt stórar fløgur.

Um so er, at nýggju karmarnir, sum skotnir verða upp í hesum lógaruppskotinum, hava við sær, at virksemið økist, og hervið eisini tolleftirlitið, so krevjast fleiri starvsfólk á Toll- og Skattstovuni til hetta arbeiði, sum landskassin ber útreiðslurnar av, sama er galdandi fyri møguligar eldv-útreiðslur. Men økta virksemið kemur eisini at økja um inntøkur landskassans, antin sum avgjøld ella skattur.

1. viðgerð 11. apríl 1996. Málið verð beint í fíggjarnevndina, sum 7. mai 1996 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 25. mars 1996 og eftir 1. viðgerð 11. apríl beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meirluta og ein minniluta.

Til at lýsa málið vórðu innkallað í fíggjarnevndina Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, umboð fyri fíggjardeildina og umboð fyri Toll- og skattstovu Føroya, og vóru tað serliga spurningar um "almenna nýtslu" og fíggjarligu avleiðingarnar, ið vórðu viðgjørdir.

Uppá fyrispurning um hvat almenn nýtsla merkir í lógaruppskotinum, vurð svarað, at tað var almenningurin, ið kundi gera nýtslu av teimum møguleikum, sum lógin heimilar. Viðv. fíggjarligu avleiðingunum varð

upplýst, at torført var at meta um hesar, tí avgerandi er jú í hvønn mun brúkarin fer at gera brúk av skipanini. Hugsast kann, at skipanin eisini fer at lætta um arbeiðið við verandi skipun. Eisini varð upplýst, at skipanin við tollkreditti orsakað av hesi lógarheimild ikki skal takast av.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Álvur Zachariasen, Anfinn Kallsberg, Kristian Mugnussen, Tórður J. Niclasen og Finnbogi Arge) tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir tinginum til at samtykkja tað.

Minnilutin (Finnbogi Ísakson) tekur ikki undir við uppskotinum og setur eiki uppskot fram.

2. viðgerð 9. mai 1996. Samtykt við 25-3-0 atkvøðum at beina málið til 3. viðgerð.

3. viðgerð 14. mai 1996. Málið endaliga samtykt við 28-1-0 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 57, 20. mai 1996.

FL, j.nr. 2520-23/91.

72 Broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald av motorakførum

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald av motorakførum.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 175 frá 18. desember 1992 um skrásetingargjald á motorakfør v.m. við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 2, stk. 1 verður orðað soleiðis:

Tað avgjaldssskylduga virðið á einum akfari við allari vanligari útgerð og cykaútgerð er vanligi søluprísurin her í landinum, tá ið skráseting fer fram, fróknað mvg, men ikki avgjald eftir hesari lóg. Avgjaldsskylduga virðið eftir pkt. 1 er tó í minsta lagi mvg - skylduga søluvirðið hækkað við 30%, men uttan vinning, og við 20%, tá ið talan er um akfør sambært § 8. Serstøk trygdarútgerð, sum er luftpútur ("airbags"), ABS-bremsur, trygdarselur við burðarnar aftan, bøgrasíðuspegil at stilla innan, bakrútsviskari, er ikki partur av avgjaldsskylduga virðinum. Landsstýrið fær heimild til við kunngerð at áseta frádráttin og neyvari reglur í samband við trygdarútgerð.

2) § 11 verður orðað soleiðis:

Motorsúkklur.

Virðisgjald: 50 cm3 og undir 10% yvir 50 cm3 100%.

§ 2.

Hendan lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer samstundis higartil galdandi danski lógartekturin úr gildi. Broytingarnar verða galdandi fyri tey akfør, ið verða skrásett frá og við hesum degi.

Viðmerkingar:

Í fyriliggjandi uppskoti Landsstýrisins til broyting í løgtingslóg um skrásetingargjald á motorakførum v.m. verður skotið upp at fremja broyting í ásetingunum um virðisgrundarlagi, ið verður nýtt sum grundarlag fyri útrokning av skrásetingargjaldinum til landskassan.

Við løgtingslóg nr. 14 frá 1. februar 1995 vóru skrásetingargjøldini á motorakførum v.m. lækkaði munandi og varð samstundis ásett, at virðisgrundarlagi til útrokning av skrásetingargjaldinum er vanligu søluprísurin íroknað mvg. Av hesum stendst, at virðisgrundarlagi eisini levnir um vinninginn hjá bilsølunum, og tá ið hesin kann verða ymiskur frá sølu til sølu gerst støddin á skrásetingargjaldinum ymiski alt eftir hvør vinningur er roknaður.

Landsstýrið metir, at rættast er, at skrásetingargjaldið eigur at liggja í meir fastari legu, og at kappingarføri hjá einkulta bilforhandlaranum ikki í so stóran mun sum nú, eigur at ávirka støddina á skrásetingargjaldinum. Tí verður við hesi lógarbroyting skotið upp, at seta í gildi eitt minsta mark fyri virðisgrundarlagnum, ið skrásetingargjaldið skal roknast av, tó soleiðis, at hetta minstamark bert verður galdandi í mun til avgjaldasviðurskiftini, og ikki verður ein binding í mun til verunligu ásetingina av vinninginum hjá bilsølunum, tá ið talan er um sølu av akførum.

Uppskotið byggir á, at enn verður sum meginregla galdandi vanligi søluprísurin t.v.s. tann prísur, ið avtalaður verður millum seljara og keypara uttan at atlit verður tikið til, hvussu gjaldingin annars verður avtala millum partarnar, men at lægstamarkið fyri virðisgrundarlagnum verður mvg-skylduga søluvirðið samlað galdandi meirvirðisgjaldslóg tó uttan vinning og hækkað við 30%.

Hetta svarar í royndina og verður til, at uttan mun til um vinningurin hjá bilseljari í tí einkultu søluni er minni enn 30%, so viðfører hetta ikki eina lækking av virðisgrundarlagnum og skrásetingargjaldinum, men verður akfar selt við størri vinningi, enn her er roknað við, so verður skrásetingargjaldið eisini lutfalsliga størri.

Tá ið talan er um akfør, sum eigarin innflytur í egnum navni, hevur tollvaldið heimild til ásetu virðisgrundarlagi eftir vanligu princippinum í § 2 stk. 1. og 2 t.v.s. at ásetu virðisgrundarlagi, sum um talan var um vanliga sølu í Føroyum, og sum greitt er frá omanfyri. Umsitingarliga hevur hendan skipan tó í praksis ikki víst seg at verða so heppin, men viðfører tann uppskotna broytingin, at tollvaldið so gott at siga í øllum førum fer at kunna ásett virðisgrundarlagi út frá teim upplýsingum sum verða til taks um bilsølu í Føroyum annars, uttan at hetta skal kosta eyka umsitingarorku. Eisini viðfører broytingin, at virðisgrundarlagi fyri innfluttar brúkar bilar eisini fer fram eftir hesi meginreglu, men at lækkingin annars fer fram sum vanligt eftir reglunum í § 15.

Landsstýrið metir, at broytingarnar í sær sjálvum ikki elva til broytingar í søluprísinum, men at tær bert tryggjað at skrásetingargjaldið altíð verður roknað av einum minsta virðisgrundarlagi.

Í uppskoti Landsstýrisins verður harumframi skotið upp, at gera nýggja bólking av skrásetingargjaldinum av øllum motorsúkklum, sum í dag uttan mun til støddi koma undir 100 % avgjald. Skotið verður upp, at motorsúkklur undir 50 kubikk koma undir 10 % avgjald meðan 100 % framvegis verður at galda fyri motorsúkklur yvir 50 kubikk.

Broytingin hevur til endamáls at geva møguleika fyri at innflyta sindar motorsúkklur, t.v.s tær sum samlaert ferðslulógini kunnu koyra maks 45 bíligari enn stórar motorsúkklurnar.

1. viðgerð 10. apríl 1996. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 7. mai 1996 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum hin 25. mars 1996 og varð eftir 1. viðgerð hin 10. apríl 1996 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og hevur undir viðgerðini býtt sig í ein meiriluta og ein minniluta.

Í sambandi við viðgerðina av málinum hevur nevndin innkallað Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, umboð fyri Fíggjar- og Búskapardeildina og umboð fyri Toll- og Skattstovu Føroya.

Undir viðgerðin er komið fram, at avleiðingarnar av uppskotinum hava við sær, at serliga teir smáu og bíligu

bilarnir verða und. 10% dýrari og í viðmerkingunum í uppskoti landsstýrisins verður beinleiðis nevnt, at hetta ikki var ætlanin. Vísandi til viðmerkingarnar í uppskoti landsstýrisins er nevndin komin til ta niðurstøðu, at ætlan landsstýrisins ikki hevur verið, at umrøddu akfør skuldu dýrka og mælir meirilutin tí til at seta prosenttalið niður til 20.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Álvur Zachariasen, Kristian Magnussen, Finnbogi Ísakson, Tórður J. Niclasen og Finnbogi Arge) mælir til at seta fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

1) § 2, stk. 1, annað punktum verður orðað soleiðis:

"Avgjaldsskylduga virðið eftir pkt. 1 er tó í minsta lagi mvg-skylduga søluvirðið hækkað við 20%, men uttan vinning og 20%, tá ið talan er um akfør sambært § 8."

Minnilutin (Anfinn Kallsberg) hevur hesar viðmerkingar:

At nakað má gernst við skrásetingargjaldið av motorakførum v.m. er einki at ivast í. Fólkaflokkurin legði tí uppskot fyri løgtingið longu 22. november 1994. Málið varð leint í skattanevndina og liggur har enn, tí landsstýrið skuldi gera sítt egna uppskot. Hetta uppskot varð so lagt fyri løgtingið 22. desember 1994.

Undir viðgerðini er nevndin gjørd varug við tað seta óhepna í, at skrásetingargjald nú eisini skal takast av vinninginum og mvg. Mvg er tað seinasta avgjaldið, ið verður lagt omaná og soleiðis er ikki bert í Føroyum. Nú er ætlanin fyri fyrstu ferð at bróta hesa meginreglu, og har ein skriða er lopin, er onnur væntandi.

Minnilutin setir tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

1) § 2, stk. 1 verður orðað soleiðis:

"Tað avgjaldsskylduga virðið á einum nýggjum akfari við allar vanligari útgerð og eykaútgerð er fakturaprísur (froknað farmagjald, flutningstrygging, vørugjald, toll, uppskipan og klárgerð)."

Um uppskot minnilutans ikki vinnur frama á tingi, tekur minnilutin í øðrum lagi undir við broytingaruppskoti meirilutans.

2. viðgerð 9. mai 1996. Broytingaruppskot minnilutans fekk 6-3-18 atkvøður og fall. Broytingaruppskot meirilutans varð samtykt við 23-0-5 atkvøðum. Samtykt við 21-1-4 atkvøðum at beina málið soleiðis broytt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 14. mai 1996. Málið endaliga samtykt við 22-1-6 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 58, 20. mai 1996.

F.L. j.nr. 2520-18/93.

73 Løgtingslóg um yvirtøku av ikki yvirtikna partinum av málsøkinum telegraf- og telefonmál og fyrireiking av løgtingslóg um nýggja telelóggávu.

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

§ 1. Løgtingið tekur undir við, at landsstýrið fyrireikar uppskot at leggja fyri løgtingið um yvirtøku, smb. heimastýrislógini § 2, av ikki yvirtikna partinum av málsøkinum telegraf- og telefonmál í Føroyum, herundir telegraf- og telefonmál millum Føroyar og umheimin, sum nevnt á lista A, pkt. 12.

§ 2. Løgtingið tekur eisini undir við, at landsstýrið fyrireikar uppskot at leggja fyri løgtingið um nýggja telelóggávu fyri Føroyar ið hevur til endamáls, at tillaga galdandi lógir á teleøkinum til tær tøkniligu og marknaðarligu broytingar, ið eru og framhaldandi vilja fara fram á hesum øki. Høvuðsdenturin í lógaruppskotinum verður lagdur á at skapa møguleika fyri liberaliseringum innan teleøkið.

Viðmerkingar:

§ 1. Telefonmál í Føroyum varð yvirtikið í 1948. Telegrafmál í Føroyum varð í 1948 beint til landsstýrissins umhugsan. Sum telemál millum Føroyar og umheimin í sínu heild, er telegrafmál í Føroyum ongantíð formelt yvirtikið. Telegrafmál lokalt í Føroyum eru tó í dag undir føroyskari fyrisiting stmb. avtalu millum generaldirektoratið fyri P&T og telefonverkið vegna landsstýrið í 1988 (skjal 1).

Viðvíkjandi ikki yvirtikna partinum av málsøkinum telegraf- og telefonmál lokalt í Føroyum, er longu nú sum grundarlag fyri uppskoti at leggja fyri løgtingið um yvirtøku, gjørt uppskot til avtalu millum Granskingarmálaráðið og landsstýri um yvirtøku og viðurskifti í hesum sambandi (skjal 2). Við hesum verður lagt upp til, at útboð av teletænastum millum Føroyar og umheimin til føroyskar felagar verður føroyskt ábyrgdar-/heimildarøki. Eisini verður lagt upp til at teleanlegg í Føroyum ið verður nýtt til telesamskifti millum Føroyar og umheimin verður latið føroyingum sum ogn saman við ábyrgdum og heimildum hesum viðvíkjandi. Áðrenn landsstýri kann leggja uppskot við filmadi um yvirtøku fyri løgtingið, er tó neyðugt at landsstýri fær fíggjarligu avleiðingarnar nærri lýstar.

Viðvíkjandi tí partinum av telegraf- og telefonmálum í Føroyum, ið fevnir um telegraf- og telefonmál millum Føroyar og umheimin er gjørd ein frágreiðing ið lýsir tey yvirordnaðu viðurskiftini í sambandi við eina møguliga yvirtøku (skjal 3). Tað sum hendan seinasta og endaliga yvirtøkan snýr seg um, er at yvirføra rættin og ábyrgdina til at gera avtalur við úflendskar teleoperatørar um teletrafik til og úr Føroyum. Í dag er tað danska telefyritøkan Tele Danmark ið hevur einkarrættin til at flýta teletrafik til og frá Føroyum. Eisini her er neyðugt at gjørdar verða nærri kanningar av fíggjarligu avleiðingunum. Møguleikarnar fyri telesamskifti við umheimin aftaná eina yvirtøku mugu kannast nærri og viðurskifti so sum tilbúgving (beredskab) og onnur líknandi viðurskifti mugu eisini verða lýst.

Í samráðingunum um yvirtøku verður stíla eftir at yvirtøkan skal fara fram 1. januar 1997

§ 2. Høvuðsreglurnar í uppskotinum til nýggja telelóggávu fyri Føroyar, verða hesar:
Lagt verður upp til, so vítt møguligt at fáa savnað tær ásetingar, ið skulu verða galdandi á teleøkinum, á einum stað, - í einari telelóg. Soleiðis verður lagt upp til eina samanskriving av lóg um telegrafer og telefoner frá 1897, og lóg um telefonir í Føroyum frá 1927, løgtingslógini um telefongjøld, umfram av reglugerðini

fyri telefonverkið ið landsstýrið hevur ásett. Eisini verður lagt upp til eina gjøgnumgongd av reglunum fyri at fáa strika tær ásetingarnar, ið við tíðini eru blívnar óaktuellar, ella sum ikki verða brúktar longur. Ætlanin er eisini at fáa eina meira nýmótans orðing av lógini.

Harumframt skulu tey telemálsøkini, sum í dag eru undir føroyskari fyrisiting smb. skjal 1, og tey telemálsøki, ið verða yvirtikin, samlast upp í nýggju føroysku telelógini.

Tann politiski málsetningurin aftanfyri gomlu einkarrættslóggávurnar á teleøkinum í flestu londum, hevur verið at tryggja at allir borgarir kundu fáa telefon til so vítt møguligt eins treytir.

Hyggur ein at teimum krøvum, ið samfelagið í dag setir til hvørjar teletænastur, ið eiga at verða útbjóðaðar, so kann telefonin ikki longur sigast at verða nøktandi.

Tað hevur víst seg, at almennu einkarrættsfyritøkurnar hava ringt við at nøkta hesi krøvini, og vísur tað seg at brúkararnir als ikki vilja góðtaka hetta. Hetta sæst við at respektin fyri einkarrættinum minkar. Tað ið einkarrættsfyritøkan ikki kann bjóða samfelagnum, eru tað onnur ið eru før fyri at veita og hvørki útbjóðarar ella brúkararnir, kunnu góðtaka at tað bert eru einkarrættsfyritøkurnar ið hava rætt til at veita hesar tænastur. Tí einkarrættsfyritøkurnar ikki hava víst seg førar fyri at fylgja við og fyri so vítt heldur ikki eru serliga motiveraðar at gera ein eyka innsats, so leingi einkarrætturin og trygdarnetið við at vera ein almenn fyritøka verjur tær. Hetta viðførir at einkarrætturin í praksis so spakuliga verður útholaður við tað at privatar fyritøkur fara at útbjóða tær tænastur, sum almennu einkarrættsfyritøkurnar ikki hava víst ans. Hóast formellar lógarbroytingar ikki verða gjørdar vilja liberaliseringarnar allíkavæl henda í praksis, uttan at nakað kann gerast fyri at fyribyrgja hesum.

Fyri á skjótasta og lættasta hátt at kunna tillaga galdandi reglur til tær broytingarnar, ið eru hendar í praksis og tey krøvini, ið standa beinleiðis fyri framman hjá okkum, umframt fyri so hvørt at kunna tillaga galdandi reglur til tey krøv, ið væntandi mugu koma, serliga til liberaliseringar, verður lagt upp til at leggja so nógvar heimildir til nærri regulering sum ráðiligt til landsstýrið.

Fyri á skjótasta og lættasta hátt at kunna tillaga galdandi reglur til tær broytigarnar, ið eru hendar í praksis og tey krøvini, ið standa beinleiðis fyri framman hjá okkum, umframt fyri so hvørt at kunna tillaga galdandi reglur til tey krøv, ið væntandi mugu koma, serliga til liberaliseringar, verður lagt upp til at leggja so nógvar heimildir til nærri regulering sum ráðiligt til landsstýrið.

Her verður serliga hugsað um:

- beinleiðis heimild til at geva einkarrætin hjá heimastýrinum í konsessión og seta treytir fyri konsessiónina og føra eftirlit við hesum.
- fulla ella avmarkaða heimild til at gera liberaliseringar,
- heimild til at seta treytir fyri etablering og rakstur av tænastum, transmissiónsvegum, og sentralum innan liberaliserað øki og hava eftirlit við hesum.
- heimild til at viðgera kærur um konsessiónshavaran, innan ávís øki møguliga beinleiðis í landsstýrinum og innan onnur øki møguliga í einari telekærunevnd, ið landsstýrið tekur stig til verður sett,
- heimild til at áleggja konsessiónshavaranum upplýsingarskyldu sum eitt supplement til eftirlitið og kærumøguleikan.

Í sambandi við fyrireikingina av lógaruppskotinum, eigur spurningurin um konsessiónshavarin skal rinda eina evt. nettoinntøkubundna veiting til landið fyri konsessiónina, eisini at verða viðgjørdur.

Somuleiðis eigur spurningurin um skipanina av konsessiónshavaranum/operatørinum, sum í dag er Telefonverk Føroya Løgtings at verða kannaður, og tilmæli at verða gjørt í hesum sambandi.

1. viðgerð 15. apríl 1996. Málið varð beint í menumarnevndina, sum 7. mai 1996 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 25. mars 1996 og eftir 1. viðgerð 15. april 1996 heint í mentannarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býti seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meiriluti (Jógvan A. Johannsen, Signar á Brúnni, Marita Petersen, Sune Jacobsen, María Hansen og Jenis av Rana) tekur sum heild undir við uppskoti landsstýrisins, men mælir til, at seinasti setningur í pkt. 2 í uppskoti landsstýrisins, ið er soljóðandi: "Høvuðsdenturin í lógaruppskotinum verður lagdur á at skapa møguleika fyri liberaliseringum innan teleøkið", verður strikaður.

Minniluti (Bjarni Djurholm) tekur undir við uppskoti landsstýrisins.

2. viðgerð 9. mai 1996. Uppskot landsstýrisins til samykt endaliga samykt við 23-0-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1920-4/96.

74 Broyting í løgtingslóg um fløt til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fløt til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 73 frá 10. mai 1994 um fløt til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir verður sum nýtt stk. 3 í § 2 sett:

"Stk. 3. Toll- og Skattstova Føroya kann geva fyritøkum loyvi til at flyta inn ella selja tær í § 1 nevndu drekkavørur í eingangsfløtum til skip og floglør, sum kunnu proviantera toll- og avgjaldsfrítt sambert kunngerð um proviantering av skipum og floglørum til nýtslu umborð ella sølu til ferðafólk."

§ 2.

Hetta lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar:

Eftir § 2, stk. 1, í løgtingslóg nr. 73 frá 10. mai 1994 um fløt til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir er tað ikki loyvt at flyta inn ella selja nevndu vørur í eingangsfløtum.

Lógin forðar tó ikki fyri, at hesar vørur verða seldar í eingangsfløtum til útlendsk skip og skip í millumlanda sigling, um vøran fer í transit beinleiðis frá pakkhúsgoymsluni á kajuni umborð, men skal vøran tá verða umbiðin uttanfrá sum ein fraktsending í navninum hjá avvarðandi skipi.

Tær føroysku heilsølurnar kappast sostatt ikki undir sama treytum sum tær útlendsku. Skotið verður tí upp, at lógin verður broytt soleiðis, at Toll- og Skattstovan kann geva fyritøkum loyvi til innflutning og sølu av

øli, mineralvatni og lidnar leskidrykkir í eingangsfløtum til skip og flogfør, sum kunna proviantera toll og avgjaldsfrítt sambært kunngerð um proviantering av skipum og flogførum til nýtslu umborð ella sølu til ferðafólk.

Ad § 1. Ætlanin við lógaruppskotinum er, at Toll- og Skattstova Føroya skal kunna geva fyrítøkum loyvi til at flyta inn ella selja tær í § 1 nevndu drekkavørur í eingangsfløtum til skip og flogfør, so sum nærri ásett í § 3.

1. viðgerð 15. apríl 1996. Málið verð beint í trivnaðarnevndina, sum 2. mai 1996 legði fram søljóðandi

Á lit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 25. mars 1996 og eftir 1. viðgerð 15. apríl 1996 beint í trivnaðarnevndina.

Undir viðgerðini hava nevndarlimir m.a. vist á, at tað tykist ógjøgnumhugsað og ikki sørt ørkymlandi fyri ferðafólk, ið koma til landið, at tollmyndugleikin leggur hald á tað, ið ferðafólk hava loyvi at hava við sær í handviðføri av t.d. øli og soda- vatni, um hesi eru í eingangsfløtum.

Fyri at fáa fleiri ferðandi til landið hevur løgtingið játtað ferðavinnuni fleiri pengar á fíggjarlógini.

Tá tað ikki er nøkur umhvørvislig orsøk til hetta albann móti eingangsfløtum, heitir ein samd nevnd, ið annars tekur undir við uppskoti landsstýrisins, á løgtingið um at samtykkja uppskot landsstýrisins við fylgjandi broytingum:

Broytingsuppskot

til
uppskot landsstýrisins.

§ 1, 1) í § 2, stk. 2 verður aftan á orðið: "pappíløtum" sett: "og innflutning sum handviðføri hjá ferðandi av teimum í § 1 nevndu drekkavørum um nøgdin ikki fer upp um tað, sum ferðandi kunnu flyta inn toll- og gjaldfrítt til Føroya (jvb. kunngerð um, hvat ferðandi kunnu flyta inn toll- og gjaldfrítt til Føroya).

Viðmerkingar:

Trivnaðarnevndin mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins tó soleiðis, at í núgaldandi lóg § 2, stk. 2 eisini verður sett inn undantak viðvíkjandi handviðføri hjá ferðandi soleiðis, at sum handviðføri kunnu verða fluttar inn tær drekkavørur, sum nevndar eru í lógini § 1 í eingangsfløtum.

Vist verður til kunngerð um, hvat ferðandi kunnu flyta inn toll- og gjaldfrítt til Føroya, galdandi kunngerð er kunngerð nr. 155 frá 28. oktober 1992. Við hesum heitir trivnaðarnevndin á landsstýrið um at broyta nevndu kunngerð samsvarandi hesari løgtingslóg soleiðis, at heimild verður til at flyta inn nevndu drekkavørur eisini í eingangsfløtum.

Heitt verður á landsstýrið at broyta kunngerðina sum skjótast, áðrenn ferðafólkastreymurin kemur til landið.

2. viðgerð 10. mai 1996. Uppskot frá Henrik Old um at beina málið aftur í nevnd fekk 5-4-15 atkvøður og fall. Broytingaruppskot frá trivnaðarnevndini verð samtykt við 17-1-7 atkvøðum. Samtykt við 19-0-7 atkvøðum at beina málið soleiðis broytt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 15. mai 1996. Málið endaliga samtykt við 20-1-7 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 88. 4. juni 1996.

FL. j.nr. 2705-3/91.

75 Løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl.

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Andrias Petersen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl

1. partur
Forskotsvís rindan av gjaldi til uppihald av einum barni

§ 1. Henda lóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar er givin út sambært § 1, stk. 2, nr. 7 í ríkislóg nr. 315 frá 15. mai 1995 um almannaveitingar í Føroyum.

§ 2. Um barnagjaldið, ásett sambært lóggávuna um rættarstøðu barnanna, ikki er goldið forfallsdagin, kann tann persónur, sum hevur rætt til at innheinta gjaldið, biðja um at tað verður goldið av tí almenna.
Stk. 2. Í sáttmála við onnur lond kann ásetast, at eitt útlendskt gjaldsskjal kann verða javnsett við eitt føroyskt, danskt og grønlendskt gjaldsskjal í sambond við forskotsvísari rindan av barnagjaldi. Fyritreytin fyri javnseting er, at skjalið í viðkomandi landi kann verða nýtt sum grundarlag fyri rettiligari innheintan av barnagjaldi.

§ 3. Gjald kann verða rindað forskotsvís til barnið fyllir 18 ár.
Stk. 2. Rætturin til at fáa gjaldið forskotsvíst rindað er treytaður av:

1) at barnið, ella tann av foreldrunum sum hevur foreldramyndugleikan yvir barnintum, hevur danskan heimarætt ella sambært reglur, ásettar av landsstýrintum, er javnsettur við heimafólkið, ella er fevndur av einum sáttmála um rindan av gjøldum av hesum slagi,
2) at barnið er búsitandi í Føroyum,
3) at barnið ikki er giftt,
4) at barnið ikki er sett heiman sambært barnaforsorgarlógini ella á einum stovni, sum er góðkendur sambært forsorgarlógini, ella á anna hátt verður uppihildið við almennum stuðlt,
5) at tann, sum gjaldið skal rindast til, hevur fastan bústað í Føroyum,
6) at tann, sum gjaldið skal rindast til, ikki býr saman við gjaldsskylduga.

§ 4. Verður biðið um at fáa gjald útgoldið fyri tíðina frammanundan dagsetingint á gjaldsskjalinum, kann gjaldið verða útgoldið hálvárliga í tann mun, sum treytirnar hava verið loknar á teimum hálvárligu forfallsdøgunum, sum høvdu komið, um gjaldsskjalið hevði verið til við byrjanini av gjaldstíðarskeiðnum.
§ 5. Gjald kann verða kravt útgoldið forskotvís við tí upphæddini, sum er ásett sambært lógini um rættarstøðu barnanna, tó í mesta lagi við eini upphædd, ið svarar til tað vanliga gjaldið, sum er 8.028 kr. árliga.

§ 6. Um tær í § 3 nevndu treytir eru loknar, kunnu serstøk gjøld, sum eru ásett sambært lógini um rættarstøðu barnanna til útreiðslur í sambond við føðingina og uppihald til móðirinnar undan og aftaná føðingina, rindast forskotsvíst av tí almenna við upp til 276 kr. við føðingina og 481 kr. um mánaðin til uppihald móðirinnar undan og aftaná føðingina.
Stk. 2. Um tær í § 3 nevndu treytir eru loknar kunnu serstøk gjøld, sum eru ásett sambært lógina um rættarstøðu barnanna til útreiðslur í sambond við barnsins dóp, konfirmatión, sjúku ella jarðarferð ella av øðrum serligum orsøkum, rindast forskotsvíst av tí almenna við eini upphædd, sum liggur innanfyri tað markið, sum háyvirvaldið setir.

§ 7. Tá tað verður mett neyðugt í mun til tarv barnanna, kann gjaldið verða rindað fyri styttri tíðarskeið í senn enn ásett í gjaldsskjalinum.

§ 8. Rætturin til at krevja gjald útgoldið forskotsvíst stendur við til og við ársdagin fyri forfallsdegnum fyri gjaldinum.
Stk. 2. Um barnið um tað mundi eitt gjald verður kravt útgoldið forkostsvíst, verður uppihildið av tí almenna, ella foreldur tess búgva saman um hetta mundið, ella móðirin býr saman við tí gjaldsskylduga, kann gjald einans útgjaldast fyri tíðina inntil almenna umsorganin ella samlívið byrjar.

§ 9. Umbøn um forskotsvísa útgjalding av uppihaldsgjaldi verður latin inn til Almannastovnin.

Stk. 2. Gjaldið verður útgoldið forskotsvíst av Føroya Gjaldstovu, sum eisini røkir innheintingina eftir reglunum í § 10.
Stk. 3. Gjaldið er skattskyldug inntøka hjá barninum.

§ 10. Tá eitt gjald verður útgoldið forskotsvíst, fgongur tað almenna í rættin til at innheinta gjaldið. Hesin rætturin er í mun til tað almenna undir vanligari 20 ára fyrning.
Stk. 2. Innheinting fer fram eftir reglunum í lóg um innheinting av uppihaldsgjøldum við fylgjandi broytingum:
1) Føroya Gjaldstova fremur panting eftir reglunum um innkrevjing av skattum og avgjøldum.
2) Lønarafturhald fer fram á sama hátt sum lønarafturhald eftir § 136, stk. 1 í skattalógini.
3) Avgerð kann ikki takast um avsiting fyri gjøld, sum viðvíkja einum tíðarskeiði sum er meira enn 1 ár frammanfyri tað tíðarskeiðið, tá forskotsvísa útgjaldindin er farin fram.

Stk. 3. Tá gjald er útgoldið forskotsvíst, yvirtekur landskassin, fyri eina upphædd, sum svarar til skyldug gjøld, rættin hjá tí gjaldsskylduga til útgjald av ov nógv goldnum skatti við endurgjaldi og rentum.

§ 11. Tað almenna skal hjá tí gjaldsskylduga royna at innheinta alla upphæddina, sum sambært resolutiónini eftir lógini um rættarstøðu barnanna eigur at verða rindað. Um so er at upphæddin, sum verður innheintað er størri enn forskotsvíst útgoldnu gjøldini, verður avlopsupphæddin útgoldin til tann, sum hevur rætt til at krevja barnagjaldið.

§ 12. Rindar ein gjaldsskyldugur til tað almenna eina upphædd til fullnað fyri forskotsvíst útgoldin gjøld, hevur hann rætt til at krevja, at upphæddin fyrst verður nýtt til fullnað fyri tann partin av gjøldunum, har avgerð er tikin um avsiting.

§ 13. Forskotsvíst útgoldin gjøld, sum ikki eru afturgoldin av tí gjaldsskylduga, skulu eftirgevast av Almannastovuni,
1) tá einki gjald forskotsvíst er útgoldið tað síðsta árið, ella
2) tá tann gjaldsskyldugi hevur verið innsettur á stovnt undir Kriminalforsorgini í úlgjaldingartíðarskeiðnum.

Stk. 2. Tað er ein fyritreyt fyri eftirgeving av forskotsvíst útgoldnum gjøldum eftir stk. 1, at tann gjaldsskyldugi ikki er føtur fyri at rinda ta skyldugu upphæddina, utan at honum kemur at vanta tað, sum má metast at vera neyðugt til egið ella familjunnar uppihald.

§ 14. Um tann gjaldsskyldugi er staddur í Danmark ella Grønlandi, verða reglurnar sambært tí har galdandi lóggávuni um innheinting av forskotsvíst útgoldnum gjøldum og um eftirgeving av slíkum gjøldum v.m. nýttar.

2. partur
Gjald til børn, tá einans annað av foreldrunum livir, umframt til faðir- og móðurleys børn v.fl.

§ 15. Um einans annað av foreldrum barnsins er á lívi, rindar tað almenna eitt gjald uppá 8.028 kr. árliga til barnsins uppihald.
Stk. 2. Sama gjald verður rindað til eitt barn føtt uttan fyri hjúnarlag, tá faðirskapurin ikki er staðfestur.
Stk. 3. Til faðir- og móðurloysingar verður rindað eitt gjald uppá 16.056 kr. árliga.

§ 16. Fyri gjaldi eftir § 15 eru treytirnar í § 3 við neyðugum tillagingum galdandi.
Stk. 2. Rætt til at móttaka upphæddina hevur tann persónur, sum hevði havt rætt til at krevja eitt gjald til barnið sambært lóggávuni um rættarstøðu barnanna.
Stk. 3. Er tað fyri eitt barn ásett eitt endurgjald til barnið fyri mistan uppihaldara, so kann endurgjaldsupphæddin frádragast í gjaldinum sambært § 15, um tað sambært lóggávuni um rættarstøðu barnanna er ella kundi verið ásett gjald til barnið frá einum uppihaldara.

§ 17. Umbøn um gjald eftir § 15 verður latin inn til Almannastovuna.

§ 18. Gjaldið verður útgoldið av Føroya Gjaldstovu mánaðarliga frammanundan. Gjaldið verður útgoldið fyrstu ferð fyri mánaðin aftaná tann mánaðin, tá treytirnar fyri at fáa gjaldið eru loknar, og seinastu ferð fyri tann mánaðin, tá rætturin til gjaldið heldur uppat. Gjøld sum skulu veitast einum barni, aftaná at ein gjaldsskyldugur er deyður, verða útgoldin frá endanum av tí tíðarskeiðnum, sum tað seinast er útgoldið gjald fyri sambært lóggávuni um rættarstøðu barnanna.
Stk. 2. Gjaldið er skattskyldug inntøka hjá barninum.

§ 19. Eftir kanning í hvørjum einstøkum føri kann Almannastovan veita stuðul til útreiðslur í sambandi við barnsins dóp, konfirmatión, sjúku og jarðarferð ella av øðrum serstakum orsøkum.

3. partur
Fyrisitingarligar ásetingar o.a.

§ 20. Avgerðir Almannastovunnar sambært hesi lóg kunnu innan 4 vikur kærast til Kærunevndina í Almannamálum.

§ 21. Tann sum móttekur stuðul sambært hesi lóg skal fráboða útgjaldandi myndugleikanum um broytingar í egnum ella barnsins viðurskiftum, ið kunnu hava við sær, at stuðulin minkar ella fellur burtur.
Stk. 2. Hevur nakar hóast betri vitan móttikið stuðul sambært lógina uttan at hava rætt til tað, skal viðkomandi afturgjalda ta upphæðina, sum er fingin av órøttum.

§ 22. Landsstýrið kann áseta nærri reglur um fyrisitingina av hesi lóg.

§ 23. Gjøld og stuðul sambært hesa lóg verða javnað eftir somu reglum sum eru galdandi fyri almannaveitingar annars.
Stk. 2. Broyting í tí vanliga gjaldinum við gildi frá einum 1. apríl ella 1. oktober, hevur gildi fyri tey hálvársgjøldini, sum forfella aftaná hesa dagseting.

§ 24. Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1997.
Stk. 2. Samstundis fer úr gildi ríkislóg nr. 57 frá 15. mars 1967 sb. lógarkunngerð almannamálaráðisins nr. 99 frá 2. mars 1988 fyri Føroyar um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl., við seinni broytingum.

Viðmerkingar:

Rammulógin fyri almannaveitingar í Føroyum (fólkatingslóg nr. 315 frá 15. mai 1995) áleggur heimastýrinum, umframt aðrar almannafyriskipanir, at gera fyriskipanir, sum umfata barnagjald til einsamallar uppihaldarar.

Lógin um barnagjald til einsamallar uppihaldarar hevur sín uppruna í lógini frá 1960, sum avloysti "Anordning for Færøerne om børnebidrag til enlige forsørgere m.m." frá 1949.
Høvuðsinnihaldið í galdandi lóg.

Høvuðsinnihaldið í galdandi lóg.

Eftir lógini um rettarstøðu barnanna, sb. fólkatingslóg nr. 200 frá 18. mai 1960 "om børns retsstilling", hava foreldur, hvør sær, skyldu til at uppihalda tí ella teimum børnum, tey eru foreldur at. Um so er, at ein av foreldrunum ikki uppfyllir uppihaldsskylduna, kann háyvirvaldið (í Føroyum ríkisumboðsmaðurin) áleggja viðkomandi at rinda eitt gjald til uppihald barnsins. Lógin um barnagjald til einsamallar uppihaldarar heimilar tí almenna at útgjalda barnagjaldið forskotsvíst, tá tað ikki er goldið forfallsdagin av tí gjaldsskylduga.

Gjaldið er lægri fyri eina gjaldsskylduga móðir (kr. 5.304) enn fyri ein gjaldsskyldugan faðir (kr. 8.028).

Umfram omanfyri nevndu forskotsvísu barnagjøld, heimilar lógin at gjalda barnagjald til einkjur og einkjumenn, til mammur, har faðirskapurin ikki er staðfestur og til uppihaldarar at foreldraleysum børnum undir 18 ár við somu gjaldsupphædd. Foreldraleys hava tó rætt til eina upphædd svarandi til faðir- og móðurgjald tilsamans.

Umfram normalgjøldini kann tað almenna rinda ávísa upphædd í samband við føðingina, ávísa mánaðarliga upphædd til uppihaldið hjá móðurini í tíðini undan og aftaná føðingina, umfram serstøk gjøld, sum háyvirvaldið setur, í samband við dóp, konfirmation, sjúku ella jarðarferð barnsins.

Forskotsvíst útgoldin gjøld til einsamallar uppihaldarar verða av tí almenna kravd inn hjá tí persóni, sum hevur gjaldsskyldu. Verður gjaldið ikki goldið rættstundis, kann innkrevjingarmyndugleikin innheintað gjaldið sambært lógini um innheinta av uppihaldsgjøldum (fólkatingslóg nr. 150 frá 24. apríl 1963 við seinni broytingum).

Rætturin til gjøldini er treytaður av at tann, ið hevur foreldramyndugleikan, ella barnið, hevur danskan heitnarrett ella er at javnseta við ein slíkan, at barnið og tann, sum gjaldið skal rindast til, hava fastan bústað í Føroyum, at barnið ikki er sett heiman sambært barnaforsorgarlógina e.t. og at faðir og móðir ikki búgva saman.

Áheitan um gjald verður latin inn til Almannastovuna, sum eisini eftir serligum reglum hevur heimild at eftirgeva gjøld.

Føroya Gjaldstova stendur fyri útgjalding av gjølduru og innheintan av krøvum.

Lógin um innheintan av uppihaldsgjøldum inniheldur reglur fyri, hvussu innheintan kann fara fram, við panting, lønarafturhaldi hjá arbeiðsgevara, avsiting o.t.

Lógin um rettarstøðu barnanna er løgd við sum fylgiskjal.

Broytingar framdar í lógini síðan 1960

Fyriskipanin frá 1949 um barnagjald til einsamallar uppihaldarar innihelt, umframt tær treytir viðvikjandi heimarætti, bústaði, samlívi við gjaldsskylduga o.s.fr. sum framvegis eru galdandi, eisini líggjarligar treytir. Uppihaldarin skuldi, fyri at fáa rætt til gjaldið, ikki hava inntøku útyvir ávíst árligt mark. Var tann, sum hevði rætt til gjaldið giftur, varð inntøkan hjá hjúnafelaganum tikin við í útrokningina av inntøkuni, sum tá kundi vera nakað hægri, enn um viðkomandi var ógiftur. Rætturin til gjaldið var sonuleiðis treytaður av, at barnið ikki hevði inntøku ella ogn av týdningi.

Var barnið ættleitt, sett í pleygu ella undir atinara forsorg, høvdu ættleiðingarforeldur, pelyguforeldur ella verja rætt til gjaldið. Var foreldramyndugleikin útintur av einum privatum ella almennum stovni e.t. varð gjaldið útgoldið hesum.

Áheitan um gjald varð um kommunustýrini latin inn til politimeistaran. Kommunustýrini skuldu samstundis fáa til vega persónligar frágreiðingar og gera kunningar, sum vóru neyðugar til tess at staðfesta, at tær kravdu treytirnar vóru uppfyltar. Politimeistarin tók avgerð og syrgdi fyri at gjaldið varð útgoldið av Gjaldstovuni til rætta viðkomandi.

Innan fyri 14 dagar aftaná fyrsta útgjald skuldi politimeistarin syrgja fyri at krevja gjaldsskylduga eftir gjaldinum, um neyðugt við panting, um hann metti, at upphæddin á hendan hátt kundi fáast inn. Politimeistarin kundi síðan avgera, um viðkomandi skuldi inn at sita fyri tann partin av gjaldinum, sum hann ikki hevði goldið. Slík avgerð skuldi tó leggjast fyri háyvirvaldið til góðkenningar. Í hesum sambandi gjørdi háyvirvaldið eina meting av, um viðkomandi tók sína uppihaldsskyldu álvarsliga. Henda meting bygdi á kanning av viðurskiftum sum forsyrgjarabyrðuni (sum giftur), gjaldsevni, arbeiðssemi, edniiligheit, heilsustøði og aðrar serliga umstøður. Kom háyvirvaldið til, at viðkomandi fyribils, av grundum, sum kundu góðkennast, ikki var førur fyri at gjalda, varð málið útsett.

Tann partur av einumhvørjum gjaldi, sum ikki varð goldin av gjaldsskylduga, var at sammeta við veita fátekrahjálp, og hevði tí somu avleiðingar sum ein slík.

Áheitan um barnagjald til einkjur, einkjumenn og foreldraleys varð latin inn til ríkisumboðsmannin eins og umbønir um aðrar almannaveitingar.

Avgerðir politimeistarans og kommunalu myndugleikanna kundu kærast til ríkisumboðsmannin og avgerðir ríkisumboðsmansins til almannamálaráðið.

Í 1960 varð lógin broytt soleiðis, at samsvar bleiv millum føroysku og dansku reglurnar á økinum. Nærri reglur vórðu ásettar fyri hvussu inntøkur hjá barninum ávirkaðu rættin til forskotsrindað barnagjald, reglurnar fyri inntøkumark vórðu gjørdar eins fyri gift og ógift, barnsburðargjald varð ásett til einkjur og aðrar einsamallar kvinnur og rætturin til barnagjald varð víðkaður til eisini at umfata børn, har faðirskapurin ikki var staðfestur, men varð hesin rætturin treytaður av meting ríkisumboðsmansins av, um umstøðurnar talaðu fyri tí.

Í 1967 verða reglurnar um inntøkumarkið fyri at fáa forskotsrindað barnagjald settar úr gildi. Vanlig regla verður sett í gildi um rætt til at fáa barnagjald svarandi til faðirgjaldið í føroym, har hvørt tað eina av foreldrunum lívir ella har faðirskapurin ikki er staðfestur, uttan mun til líggjarligu viðurskifti hjá uppihaldara og

barni. Somuleiðis verður rætturin til gjald hjá foreldraleysum óheftur at fíggjarligu viðurskiftunum hjá móttakaranum.

Reglan um, at ríkisumboðsmaðurin í føroum, har faðirskapurin ikki var staðfestur, skuldi meta um umstøðurnar, áðrenn umsøkjarin fekk rætt til gjaldið, verður samstundis sett úr gildi við teirri grundgeving, at spurningurin um skylduna hjá mammuni at geva upplýsingar eiga at verða reguleraðar eftir familjurættarligum reglum og ikki knýtast at ásetingunum í sosialu lóggávuni um veitingar til børn.

Sum avleiðing av meginregluni um, at forsorgarhjálp ikki longur skuldi gjaldast aftur, varð reglan um, at ikki goldin barnagjøld vóru at samanmeta við móttikna fátækrahjálp, sett úr gildi. Í staðin verður regla innført um 20-ára fyrning av skuldini. Reglan um rindan av barnagjaldi til ein almennan myndugleika varð somuleiðis sett úr gildi.

Innheintan av gjøldum skuldu hereftir fara fram eftir reglunum í lógini um innheintan av uppihaldsgjøldum, og vórðu reglurnar í lógini um innheintan og avleiðingar av ikki goldnum gjøldum tí settar úr gildi.

Í 1970 verður heimildin hjá landfútanum (politimeistaranum) flutt til ríkisumboðsmannin. Í 1975 verður heimildin hjá Ríkisumboðsmanninum, í samband við yvirtøkuna av fyrisitingini av almannamálum, flutt til Almannastovuna.

Aðrar broytingar enn tær, sum nevndar eru, hava snúð seg um broytingar í upphæddum og javning.

Lógaruppskoðið

Fyriliggjandi uppskot er fyri lann stórsta partin ein umseting av galdandi fólkatingslóg.

Broytingarnar eru hesar:

1) upphæddin verður hin sama fyri móður- og faðirlgjald,
2) rætturin til gjaldið hjá móður-, faðir- ella foreldraleysum er lokin, tá treytirnar fyri gjaldinum eru loknar, (vs. mánaðan eftir andlát foreldranna, og ikki sum í galdandi lóg, mánaðin eftir at áheitan er komin inn um gjald,
3) ásett verður, at gjaldið í skattligum sambandi er inntøka hjá barninum, soleiðis at samsvar er ímillum galdandi siðvenju og lógina, og
4) reglurnar um innheintan eru nágreinaðar og tillagaðar tí innkrevjingarhátti, sum Føroya Gjaldstova annars brúkar í sambandi við innkrevjan av útistandandi skattaskuld o.ø., og hevur hetta við sær, at Gjaldstovan kann innheinta gjøld beinleiðis yvir skattaskipanina í staðin fyri at lata út til arbeiðsgevaran við áheitan um innheintan. Harumframt verður staðfest, at Gjaldstovan kann panta krøvini, sum tí ikki longur skulu pantast av fútarættinum.

Fíggjarligar avleiðingar:

Metu verður ikki, at uppskotið hevur við sær fíggjarligar avleiðingar. Talan er um 10 - 15 mammur, ið gjalda til páspar, og krøvini verða innheintað hjá gjaldsskyldugu mammuni.

Viðmerkingar frá ummælandi stovnum o.ø.

Uppskotið hevur verið til ummælis á Almannastovuni, Føroya Gjaldstovu og Sosialráðgevarafelag Føroya.

Føroya Gjaldstova mælti til broytingar í reglunum um innheintan av krøvum, umframt nágreining av, at tað er Almannastovan, sum kann eftirgeva krøv. Hetta tilmæli er tikið til eftirtektar í uppskotinum.

Broytingaruppskotini hjá Føroya Gjaldstovu eru tikin við í endaliga lógaruppskotið.
Somuleiðis er uppskot frá Sosialráðgevarafelagnum og Almannastovuni viðvikjandi dagfestingini fyri rættinum til uppihaldsgjald hjá foreldraleysum o.ø. tikið til eftirtektar í endaliga uppskotinum.

Sosialráðgevarafelagið skjýtur harumfram upp, at uppihæddirnar í Føroyum verða settar samsvarandi teimum donsku. Danska normalgjaldið er 8.436 kr. um árið mótvegis 8.028 kr í Føroyum. Gjaldið í samband við føðingina er 483 kr. í Danmark mótvegis 276 kr. í Føroyum og uppihaldsgjaldið til mammuna undan og aftaná føðingina er 841 kr. um mánaðin í Danmark mótvegis 481 kr. um mánaðin í Føroyum.

Hetta uppskotið frá Sosialráðgevarafelagnum er ikki tikið til eftirtektar, vísandi til, at almannaveitingarnir í Føroyum í dag yvirhøvur eru øðrvísi og lægri enn í Danmark, og at serlig grund ikki er til, at jústhesar upphæddir skulu vera tær sonnu í Føroyum sum í Danmark.

1. viðgerð 28. mars 1996. Málið verð beint í trivnaðarnevndina, sum 24. apríl 1996 legði fram soljóðandi

Á lit

Málið er lagt fram av landsstýrintum tann 25. mars 1996 og eftir 1. viðgerð tann 28. mars 1996 beint í trivnaðarnevndinn.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og **ein samd nevnd** mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 29. apríl 1996. Samtykt við 23-0-0 atkvøðum at beina málið til 3. viðgerð.

3. viðgerð 8. mai 1996. Málið endaligt samtykt við 24-0-0 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 71, 20. mai 1996.

F.L. j.nr. 1015-19/93.

76 Stuðul til politiskt virksemi og politiska upplýsing.

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Vilhelm Johannesen vegna seg sjálvan og løgtingsmenninar Anfinn Kallsberg, Álv Zachariasen, Finnboga Ísakson, Kristian Magnussen, Tórd J. Niclasen og Finnboga Arge fram soljóðandi

Uppskot

til

<u>løgtingslóg um stuðul til politiskt virksemi og politiska upplýsing.</u>

§ 1. Endamálið við hesi lóg er at styrkja politiska arbeiðið og politiska upplýsing við at veita stuðul úr landskassanum, sum kann brúkast til

a) rakstur av einum politiskum flokki, herundir útvegan av lastari ogn til politiskt virksemi,

b) skeið- og fundarvirksemi um politisk/samfelagslig tól,

c) útgávu av blaðum, tíðarritum, bókum, bondum og fløgum við politiskum/samfelagsligum innihaldi, ella

d) kanning av viðurskiftum, sum hava við føroyskt samfelagið at gera.

§ 2. Úr landskassanum verður veittur stuðul til teir politiskt flokkar, sum sambert hvørt seinasta

løgtingsval hava fingið umboð á tingi.
Stk. 2. Stuðul verður eisini veittur tingmanni, sum er valdur uttanflokka.

§ 3. Stuðulin verður veittur sambæt játtan á fíggjarløgtingslógini á hvørjum ári.
Stk. 2. Upphæddin verður býtt millum flokkar og uttanflokkatingmann eftir atkvøðutali teirra á seinasta løgtingsvalt. Hjá valdum uttanflokkstingmanni verða allar atkvøður, sum hann, listin og onnur valevni fingu, taldar við í uppgerðini.
Stk. 3. Stuðul verður veittur landsnevndini hjá flokki, smb. tó stk. 5 og 6, ella uttanflokkatingmanni eftir umsókn, sum skal sendast landsstýrinum í seinasta lagi 6 mánaðir eftir hvørt løgtingsval. Stuðul verður síðani veittur uttan umsókn, til løgtingsval aftur er, smb. tó stk. 5 og 6.
Stk. 4. Stuðul verður veittur frá 1. í mánaðinum eftir, at løgtingsval hevur verið, og til endan á tí mánaði, tá løgtingsval er.
Stk. 5. Tingmaður, sum fer úr ella verður koyrdur úr einum tingbólki í valskeiðinum, fær eftir umsókn stuðul sambæt hesi lóg frá 1. í mánaðinum eftir, at løgtingið hevur fingið skrivliga fráboðan um hetta. Upphæddin, sum goldin verður honum, verður býtt eftir tingmannatali floksins. Stuðulin, sum viðkomandi flokkur fær, minkar samsvarandi.
Stk. 6. Tingmaður, sum er í tingbólki hjá einum flokki, hevur eftir umsókn ræt til at fáa part av floksins stuðli útgoldnan í staðin fyri, at allur stuðulin verður goldin landsnevnd floksins. Tingmaður skal í hesum føri boða løgtinginum og landsstýrinum skrivliga frá hesum. Stuðul verður veittur hesum tingmanni frá 1. í mánaðinum eftir, at Landsstýrið hevur fingið fráboðan um hetta. Upphæddin, sum goldin verður honum, verður býtt eftir tingmannatali floksins. Stuðulin, sum viðkomandi flokkur fær, minkar samsvarandi.

§ 4. Landsstýrið rindar stuðul sambæt hesi lóg í eins stórum mánaðargjøldum, smb. tó § 3, stk. 3.

§ 5. Tann, sum fær stuðul sambæt hesi lóg, skal seta upphæddina á serstaka banka-, spariknssa- ella girokonto, sum ikki kann brúkast til onnur endamál.
Stk. 2. Tann, sum fær stuðul, skal í seinasta lagi 1. apríl á hvørjum ári senda landsstýrinum fráboðan um, at stuðulin í álmanakkaárinum fyri er nýttur til tey endamál, sum eru nevnd í § 1.
Stk. 3. Heldur landsstýrið, at peningurin er ikki nýttur til nevndu endamál, kann tað steðga útgjaldinginí fyribils.

§ 6. Landsstýrið kann í kunngerð áseta nærri reglur sambæt hesi lóg.

§ 7. Henda lóg hevur gildi frá 1. januar 1996. Tó kann útgjaldingin í § 3, stk. 5 og 6, galda frá gildiskonu lógarinnar, um tingmaður sendir tær nevndu fráboðanir inn í seinasta lagi 14 dagar eftir at henda lóg er komin í gildi. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 18 frá 27. apríl 1967.

Viðmerkingar:

Teir politisku flokkarnir, sum eru umboðaðir á tingi, hava fingið stuðul úr landskassanum til politiska upplýsing síðani 1967. Løgtingslóg um stuðut kom í gildi 1. apríl hetta árið.

Frá og við fíggjarárinum 1971/72 stóð viðmerking á fíggjarlógini, sum ásetti gjøllari reglur um, hvussu stuðulin skuldi latast. Viðmerkingin er dottin burtur á fíggjarlógini fyri 1996.

Tað hevur vist seg, at lógin var ikki nóg fullfíggjað. M.a. var einki ásett um, hvussu stuðulin skuldi latast, um flokkur fór í tvíntingar ella onnur ósemja tók seg upp. Heldur ikki var nøkur ásetting um, hvørjum stuðulin skuldi latast, ongar reglur vórtu um, hvat hann kundi brúkast til, og einki eftirlit var við nýtslunt.

Fyri at høta um hesi viðurskifti verður hetta uppskot lagt fram.

Viðmerkingar til tær einstøku greinarnar.
§ 1. Her verður ásett, at stuðulin skal nýtast til politiskt virksemi og politiska upplýsing, og ikki til onnur endamál.

Greinin skal skiljast soleiðis, at flokkur, sum er skuldarbundin av slíkum virksemi, sum hevur verið samsvarandi hesi grein, kann eisini nýta stuðulin til at niðurgjalda skuld við.

§ 2. Nýtt í hesi greinini er, at roknað verður eisini við, at tingmaður kann verða valdur uttanflokka. Hann eigur tá sambæri greinini rætt til stuðul eins og politiskir flokkar.

§ 3. Nýtt í hesi grein er, at játtan á fíggjarløgtingslógini er grundarlag fyri stuðlinum.
Stk. 2. Her verður lógarfest, at atkvøðutalið hjá flokki ella valdum uttanflokkstingmanni skal nýtast til útrokning av stuðlinum.
Stk. 3. Í gomlu lógini varð onki sagt um, hvørjum stuðulin skuldi latast. Her verður ásett sum høvuðsregla, at landsnevndin hjá einum flokki fær stuðulin útgoldnan. Umsókn skal sendast landsstýrinum í seinasta lagi 6 mánaðir eftir, at løgtingsval hevur verið, t.v.s. at um ongin umsókn er komin innan hesa freist, fær flokkur ella tingmaður ikki stuðul í valskeiðinum. Er umsóknin komin inn rættstundis, verður stuðul goldin restina av valskeiðinum uttan aðra umsókn.
Stk. 4. Ongar reglur hava verið um, nær stuðulsveitingin byrjar og endar. Her verður ásett, at stuðul verður veittur frá 1. í mánaðinum eftir løgtingsval til endan á mánaðinum, tá løgtingsval er aftur.
Stk. 5. Í hesum stk. verður ásett, hvussu mannagongdin skal vera, tá ein tingbólkur fer í fleiri partar.
Stk. 6. Tað hevur víst seg, at stór ósemja kann taka seg upp í einum flokki, hóast tingbólkurin ikki formliga fer sundur. Skotið verður tí upp, at tingmaður, sum er limur í einum tingbólki, kann krevja sín part av stuðlinum í staðin fyri, at hesin verður goldin landsnevndini.

§ 4. Ongar reglur hava verið um, nær á árinum stuðulin skal gjaldast. Her verður ásett, at hann skal gjaldast í eins stórum mánaðargjøldum. Víst verður til § 3, stk. 3 av tí, at vikið kann verða frá hesi reglu, um umsókn um stuðul ikki kemur inn, fyrr enn fleiri mánaðir eftir løgtingsval. Tá eigur studningurin fyri hetta tíðarskeið at verða goldin í einum.

§ 5. Greinin ásetir reglur fyri, hvar peningurin skal setast inn. Flokkur ella tingmaður, sum fær stuðul, skal á hvørjum ári senda landsstýrinum fráboðan um, at stuðulin er nýttur smb. § 1 í hesi lóg. Er hann ikki nýttur til hesi ehdamál, kann landsstýrið steðga útgjaldingini fyribils, til greiða er fingin á málinum.

§ 6. Hóast reglurnar í hesi lóg eru greiniligar, kann verða tørvur á gjøllari reglum, sum landsstýrið fær heimild at áseta í kunngerð.

§ 7. Løgtingslógin fær gildi 1. januar 1996, og tann gamla lógin fer úr gildi sama dag. Eisini er ein skiftisregla við í hesi grein.

1. viðgerð 27. mars 1996. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 10. apríl 1996 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av løgtingsmonnunum Vilhelm Johannesen, Anfinn Kallsberg, Finnboga Ísakson, Álvi Zachariasen, Kristian Magnussen, Tordi J. Nielasen og Finnboga Arge tann 25. mars 1996 og varð eftir 1. viðgerð tann 27. mars 1996 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og mælir **ein samd nevnd** tinginum til at samtykkja tað.

2. viðgerð 24. apríl 1996. Uppskot frá Bjørn á Heygum um at beina málið aftur í nevnd fekk 8-0-17 atkvøður og fall.

Atli Hansen legði vegna sambandsflokkin fram soljóðandi

Broytingaruppskot

1) § 3, stk. 5 verður orðað soleiðis:

"Stk. 5. Tinglimur, sum fer úr ella verður koyrdur úr einum tingbólki í valskeiðnum, fær eftir umsókn stuðul sambært hesi lóg frá 1. í mánaðinum eftir, at løgtingið hevur fingið skrivliga fráboðan um hetta. Upphæddin, sum goldin verður litni, ið fer ella verður koyrdur úr tingbólki, verður býtt eftir persónliga

atkvøðutalinum, sum viðkomandi fekk á seinasta løgtingsvali. Stuðulin, sum viðkomandi flokkur fer, minkar tilsvarandi."

2) § 3, stk. 6 verður orðað soleiðis:

"Stk. 6. Tinglimur, sum er í tingbólki hjá einum flokki, hevur eftir umsókn rætt til at fáa part av floksins stuðuli útgoldnan í staðin fyri, at allur stuðulin verður goldin landsnevnd floksins, tó skal ein meiriluti í viðkomandi tingbólki góðkenna hesa broyting. Tinglimur skal í hesum føri boða løgtinginum og landsstýrinum skrivliga frá hesum. Stuðul verður veittur hesum tinglimi frá 1. í mánaðinum eftir, at landsstýrið hevur tingið fráboðan um hetta. Upphæddin, sum goldin verður hesum limi, verður býtt soleiðis, sum ein meiriluti í viðkomandi tingbólki ásetur, og kann tað vera í mun til tingmannatal floksins, ella í mun til atkvøðutaltð, sum viðkomandi flokkur fekk á seinasta løgtingsvali. Stuðulin, sum viðkomandi flokkur fer, minkar samsvarandi."

Sambandsflokkurin boðaði seinni frá, at pkt. 2 í uppskotinum verð afturtikið. Broytingaruppskot sambandsfloksins pkt. 1 fekk 8-0-18 atkvøður og fall.

Heini O. Heinesen legði fram soljóðandi

Broytingaruppskot

§ 3, stk. 6 verður orðað soleiðis:

"Stk. 6. Tinglimur, sum fer ella verður koyrdur úr tingbólkinum hjá einum flokki í valskeiðinum, hevur eftir umsókn rætt til at fáa part av floksins stuðuli útgoldnan í staðin fyri, at allur stuðulin verður goldin landsnevnd floksins. Upphæddin, ið goldin verður limi, ið fer ella verður koyrdur úr tingbólkinum, verður býtt eftir persónliga atkvøðutalinum, sum viðkomandi fekk við seinasta løgtingsval. Tinglimur skal í hesum føri boða løgtinginum og landsstýrinum skrivliga frá hesum. Stuðul verður veittur hesum tinglimi frá 1. í mánaðinum eftir, at landsstýrið hevur tingið fráboðan um hetta."

Broytingaruppskotið fekk 7-1-18 atkvøður og fall.

Upprunauppskotið §§ 1-7 varð samtykt við 19-4-3 atkvøðum. Samtykt við 22-4-0 atkvøðum at beina málið til 3. viðgerð.

Ingeborg Vinther legði vegna seg sjálva og løgtingsmennirnar Jenix av Rana, Bjørn á Heygum og Lassa Klein fram soljóðandi

Broytingaruppskot

1). § 7, 1. pkt. verður soljóðandi:

"Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd."

Viðmerkingar:

Á fíggjarlógini, sum sett varð í gildi 1. januar 1996 er játtaður stuðul til politiskt virsemi og upplýsing.

Hóast hetta, er eingin peningur útgoldin hígartil í ár, við teirri grundgeving, at bíðað verður eftir nýggju lógini.

Ein møguleiki hevði sjálvsagt verið, at framt lógarbroytingina í tíð, tað vil siga til 1. januar 1996, men tá hetta ikki er gjørt, eigur at verða unsitið eftir galdandi lóg, heldur enn at geva nýggjo lógini afturvirkandi gildi. Tað er átalurvert at lógarbroytingin hevur bíðað í 4 mánaðir og er tað ein óvani at seta lógir í gildi við afturvirkandi gildi - tað er hetta uppskotið eitt gott dømi um, serliga tá hugsað verður um, at allir møguleikar hava verið til at framt lógarbroytingina innan fyri teir seinastu 4 mánaðirnir.

Tá gingið verður so leitliga um landsins lógir, má setast spurnartekin við, hvar rettartrygd borgarans er.

3. viðgerð 14. mai 1996. Broytingaruppskotið fekk 3-5-21 atkvøður og fall. Upprunauppskotið endaliga samtykt við 22-4-3 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 92, 4. juni 1996.

77 Løgtingslóg um varðveiting av fjølbroyttum fiskiflota

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Ivan Johannesen, landsstýrismaður fram soljóðandi

U p p s k o t

til

Løgtingslóg um varðveiting av fjølbroyttum fiskiflota.

§ 1. Heimilað verður landsstýrinum, av játtan á Løgtingsfíggjarlógini, at útgjalda stuðul til rakstur og/ella veðhalda fyri parti av útgerðarláni, til less at varðveita fjølbroyttan fiskiflota og at gjalda fyri eygleiðaraskipanir uttanfyri føroysku landleiðirnar.

§ 2. Stuðul til rakstur og/ella veðhald fyri parti av útgerðarláni, kann latast fiskifari, sum alt árið ella part av árinum rekur fiskiskap uttanfyri føroysku landleiðirnar, og sum vegna vánaliga stødu í fiskastovnunum á teimum leiðum, har fiskifarið vanliga roynur, ikki ber seg rakstarliga, men at útlit eru fyri, at fiskiskapurin kann gerast lønandi aftur, og um fiskiskapurin vegna vánalig stuttíðar útlit kann detta niðurfyri og fiskirættindini hjá Føroyum á hesum leiðum tí kunnu detta burtur.

§ 3. Á fiskileiðum uttanfyri føroysku landleiðirnar, har Føroyar sambæri millumlanda avtalum ella øðrum avtalum hevur skyldu at hava eftirlit við fiskiskapi, kann landsstýrið gjalda kostnaðin av tílíkum skipanum eftir hesi lóg.

§ 4. Hendan lóg fær gildi dagin eftir,at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar:

Ætlanin við uppskotinum er at fáa til vega møguleika fyri at stuðla tí parti av fiskiflotanum, sum ikki er undir lógunum um fløgustuðul.

Endamálið við uppskotinum er, í tann mun tað er rímuligt, at varðveita ein fjølbroyttan fiskiflota, at stuðla fiskiskapi eftir kvotum v.m. uttanfyri føroysku landleiðirnar í tíðarskeiðum, har hesin fiskiskapur ikki ber seg rakstrarliga, men útlit eru fyri, at fiskiskapurin aftur gerst lønandi, og har vandi er fyri, at fiskirættindini hjá Føroyum, vegna vánalig stuttíðar útlit, kunnu detta burtur.

Somuleiðis er endamálið við uppskotinum at gjalda tað eygleiðing við fiskiskapi í altjóðu sjógvi v.m., sum

Føroyar sambært millumtjóða avtalur binda seg til, t.d. eygleiðaraskipanina í NAFO.

Uppskotið er viðgjørt í Fiskivinnustarvsnevndini, og hevði nevndin onga viðmerking.

Játtanin á fíggjarløgtingslógini til hesi endamál er 3 mló. kr., og verður roknað við, at hetta er tað, sum í mesta lagi verður brúkt.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

Ad § 2: Skipabólkarnir, talan er um, eru: Saltfiskalínuskipini, verksmiðjutrolararnir, rækjutrolararnir, frystilínuskipini, nótaskipini v.m.

Ad § 3: Endamálið við uppskotinum er m.a. at gjalda ta eygleiðing av fiskiskapinum í altjóða sjógvi v.m., sum Føroyar sambært millumtjóða avtalu bindur seg til, t.d. eygleiðaraskipanin í NAFO.

1. viðgerð 9. apríl 1996. Málið varð beint í vinnunevndina, sum 12. apríl 1996 legði fram soljóðandi

Á l i t

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 25. mars 1996 og eftir 1. viðgerð tann 9. apríl 1996 beint í vinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og hevur undir viðgerðini havt fund við Ivan Johannesen, landsstýrismann og Eyðfinn Finnsson, fulltrúa í fiskivinnuumsitingini. Landsstýrismaðurin greiddi nevndini frá, hvussu játtanin higartil hevur verið umsitin. Hann segði, at ongar reglur hava verið fyri útgjaldi av hesi játtan.

Uppskot landsstýrisins heimilar landsstýrinum at útgjalda stuðul til rakstur og/ella at veðhalda fyri part av útgerðarláni. Nevndin er samd um, at upphæddin, ið játtað verður til rakstur ella veðhald til útgerðarlán, ongantíð má fara uppum ta til eina og hvørja tíð játtaðu upphædd á løgtingsfíggjarlógini. Nevndin setir tí fram broytingaruppskot samsvarandi hesum.

Nevndin er samd um at mæla løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins við nevndu broyting og setir tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

Í § 1, stk. 1 verður sett inn aftaná orðini "parti av útgerðarláni," "tó í mesta lagi ta til eina og hvørja tíð játtaðu upphædd á løgtingsfíggjarlógini."

2. viðgerð 22. apríl 1996. Broytingaruppskot frá samdari vinnunevnd varð samtykt við 22-0-0 atkvøðum. Samtykt við 22-0-0 atkvøðum at beina málið soleiðis broyti til 3. viðgerð.

3. viðgerð 29. apríl 1996. Málið endaliga samtykt við 24-1-0 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 72, 20. mai 1996.

F.L. j.nr. 1500-25/96.

78 Broyting í løgtingslóg um minstuløn, dagstudning og minstaforvinning

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Ivan Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um minstuløn, dagstudning og minstaforvinning.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 32 frá 27. mars 1992 um minstuløn, dagstudning og minstaforvinning við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 1 verður soljóðandi:

"**§ 1.** Við tí endamáli at tryggja inntøkur fiskimanna verður landsstýrinum heimilað at útgjalda minstuløn og dagstudning til persónar, heimahoyrandi í Føroyum, um tað ikki er í stríð við aðrar avtalur, sum vinna á føroyskum fiskiførum 20 BRT ella størri, sum hava veiðiloyvi."

2) § 3, 3) verður strikað.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi tann 1. í mánaðinum, aftaná at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar:

Vísandi til uppskot um mánaðarminstuløn til útróðrarmenn er neyðugt at gera nevndu broytingar í lógini um minstuløn, dagstudning og minstaforvinning.

Broytingin merkir, at fiskiør smærri enn 20 BRT ikki kunnu koma undir skipanina við minstuløn og dagstudningi og minstaforvinning. Broytingin er neyðug, um lógaruppskotið um mánaðarminstuløn til útróðrarmenn skal virka eftir ætlan.

§ 1 verður broytt, og § 3, 3) verður strikað samsvarandi hesi ætlan.

Broytingin hevur onga ávirkan á skipaninar við inntøkutrygd til manning á fiskiførum 20 BRT ella størri.

Uppskotið er viðgjørt í Fiskivinnustarvsnevndini. Umboðið fyri manningarfeløgini mótmælti, at minstiforvinningur v.m. verður settur úr gildi fyri útróðrarbátar undir 20 BRT.

Verður § 1 ikki broytt og § 3, 3) ikki strikað, verða tvær ymiskar skipanir við inntøkutrygd til manningar á fiskiførum smærri enn 20 BRT. Verður lógarbroytingin ikki framl, dettur høvuðsætlanin við uppskotinum um mánaðarminstuløn burtur, nevniliga tað at ein og samu skipan við inntøkutrygd verður galdandi fyri manningar á útróðrarbátum minni enn 20 BRT.

Vísandi til uppskot um mánaðarminstuløn til útróðrarmenn (løgtingsmál nr. 80/1995) verður mælt til, at báðar lógirnar fáa gildi tann 1. í mánaðirnum aftaná, at tær eru kunngjørdar.

1. viðgerð 9. apríl 1996. Málið varð heint í vinnumálanevndina, sum 7. mai 1996 legði fram soljóðandi.

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 25. mars 1996 og eftir 1. viðgerð 9. apríl 1996 beint í vinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meirilurta og tríggjar minniluta.

Meirilutin (Henrik Old, Jákup Joensen, Óli Jacobsen og Álvur Zachariasen) vísir á løgtingsmál nr. 80/1995: Løgtingslóg um mánaðarminstuløn til útróðrarmenn og hevur broytingin í fyriliggjandi uppskoti samband við hetta mál.

Undir viðgerðini hevur landsstýrið gjørt vart við, at í grein 1 í uppskotinum er orðið "minstaforvinning" av misgávum dottið burtur úr lógartekstinum. Meirilutin setur tí fram broytingaruppskot til grein 1. Landsstýrið mælir til, at báðar lógirnar fáa gildi sama dag og mælir meirilutin til at lógin fær gildi 1. juni 1996. Meirilutin tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins við nevndu broytingum og setir tí fram soljóðandi

broytingaruppskot

til

uppskot landstýrisins

1) § 1 verður soljóðandi:
"§ 1. Við tí endamálið at tryggja inntøkur fiskimanna verður landsstýrinum heimilað at útgjalda minstuløn, minstaforvinning og dagstudning til persónar, heimahoyrandi í Føroyum, um tað ikki er í stríð við aðrar avtalur, sum vinna á føroyskum fiskiførum 20 BRT ella størri, sum hava veiðiloyvið."

2) § 2 verður soljóðandi: "§ 2. Hendn lóg kemur í gildi tann 1. juni 1996"

Minnilutin (John Petersen) vísir á álit í løgtingsmáli nr. 36/1995: Løgtingslóg um mánaðarligan minstaforvinning til skrásettar útróðrarmenn, har fyritreytin er, at allar aðrar lógir og fyriskipanir um minstaforvinning fara úr gildi. Tí verður mælt til, at hesin partur av løgtingslóg nr. 32 frá 27. mars 1992 um minstuløn, dagsstudning og minstaforvinning, verður settur úr gildi.

Minnilutin (Heini O. Heinesen) kann ikki taka støðu í málinum uttan at løgtingsmál nr. 36/1995: Løgtingslóg um mánaðarligan minstaforvinning til skrásettar útróðrarmenn verður samtykt og tekur minnilutin (Heini O. Heinesen) tí støðu í tingsalinum.

Minnilutin (Lasse Klein) tekur ikki undir við broytingunum, sum landsstýrið skjýtur upp, og vil ikki gera mun á útróðrarmonnum, sum rógva við bátum yvir og undir 20 BRT, hvat ið minstuløn, dagstudningi og minstaforvinningi viðvíkur. Víst kann eisini verða til mótmæli hjá umboðnum fyri manningarfelógini í Fiskivinnustarvsnevndini og til løgtingsmál nr. 36/1995 um mánaðarligan minstaforvinning til skrásettar útróðrarmenn, har skotið verður upp í grein 7, at "útróðrarmenn velja sjálvir, um teir koma undir hesa skipan, mynstra ella fáa minstaforvinning." Tað er lítil meining í at lata nakrum velja, tá ið samtíðis verður tikið burtur, sum veljast kann ímillum. Her er aftur eitt dømi um, hvussu lítið ið útróðrarmaðurin verður virðir.

2. viðgerð 13. mai 1996. Broytingaruppskot meirilutans varð samtykt við 24-0-0 atkvøðum. Samtykt við 24-0-0 atkvøðum at heina málið soleiðis broytt til 3. viðgerð.

14. mai 1995 varð loyvi tingsins fingið at vikja frí tíðarfreistini millum 2. og 3. viðgerð. Samtykt við 29-0 atkvøðum.

John Petersen legdi vegna sig sjálvan og løgtingsmenninar Henrik Old, Jákup Joensen, Álv Zachariasen, Heina O. Heinesen, Óla Jacobsen og Jákup Olsen fram soljóðandi

Broytingaruppskot

1) Í § 1 verða orðini "20 BRT ella størri" strikað.

2) § 3, 2) verður strikað og § 3, 4) verður § 3, 2).

3) § 5 verður strikað og § 6, 7, 8 og 9 verða § 5, 6, 7 og 8.

4) Har orðið "minstaforvinning/ur" kemur fyri í lógini verður orðið strikað.

3. viðgerð 15. mai 1996. Broytingaruppskotið varð samtykt við 28-0-0 atkvøðum. Málið sum samtykt við 2. viðgerð og broytt við 3. viðgerð endaliga samtykt við 27-0-0 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 91, 4. juni 1996.

79 Løgtingslóg um studning til skipasmiðjur

Ár 1996, mánadagin 25. marx legdi Ivan Johannesen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um studning til skipasmiðjur.

§ 1. Til fulla ella partvísa endurrinding av farmagjaldsútreiðslunum av tilfari til bygging av flótandi eindum, verður landsstýrinum heimilað av árligu játtanini á fíggjarlógini at lata skipasmiðjuni í studningi upp til 4,5 % av sáttmálaprísinum.
Stk. 2. Til fulla ella partvísa endurrinding av farmagjaldsútreiðslunum av tilfari til umbygging av teimum í stk. 1 nevndu flótandi eindum, verður landsstýrinum heimilað av árligu játtanini á fíggjarlógini at lata skipasmiðjuni í studningi upp til 4,5% umbyggingarkostnaðinum, tá umbyggingin er 3 mió. kr. ella meira.

§ 2. Til fulla ella partvísa endurrinding av innflutningsgjøldum av tilfari til bygging av flótandi eindum í Føroyum, verður landsstýrinum heimilað av árligu játtanini á fíggjarlógini at lata skipasmiðjuni í studningi upp til 3,5% av sáttmálaprísinum.
Stk. 2. Til fulla ella partvísa endurrinding av innflutningsgjøldum av tilfari til umbygging av flótandi eindum í Føroyum, verður landsstýrinum heimilað av árligu játtanini á fíggjarlógini at lata skipasmiðjuni í studningi upp til 3,5% av umbyggingarkostnaðinum, um umbyggingarkostnaðurin verður 3 mió. kr. ella meira.

§ 3. Studningur verður veittur eftir umsókn. Landsstýrið ásetur í kunngerð nærri reglur hesum viðvíkjandi, herundir hvussu og nær studningurin kann verða veittur.

§ 4. Henda lóg fer gildi frá 1. januar 1996.
Stk. 2. Samstundis fara úr gildi §§ 3 og 4 í løgtingslóg nr. 38 frá 20. mai 1988 um stuðul til bygging av fiskiskipum á føroyskum skipasmiðjum til útflutnings, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 83 frá 13. juni 1995, § 9 í løgtingslóg nr. 102 frá 19. august 1988 um endurnýggjing av fiskiskipaflotanum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 83 frá 13. juni 1995, §§ 2 og 3 í løgtingslóg nr. 83 frá 9. juni 1990

um stuðul til bygging av farmaskipum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 83 frá 13. juni 1995 og løgtingslóg nr. 47 frá 8. mai 1991 um stuðul til bygging av skipum og flótandi eindum til alivinnuna á føroyskum virkjum.
Stk. 3. Tilsøgnir um stuðul givnar, áðrenn henda lóg kemur í gildi, verða viðgjørdar eftir higartil galdandi lóggávu.

Almennar viðmerkingar:

Hóast heimild er í ávísum løgtingslógum at stuðla føroyskum skipasmiðjum í sambandi við skipabygging, so hevur hetta ikki verið gjørt tey seinastu árini. Landsstýrið metir tó, at tað er rætt at veita studning til endurrinding av farmagjaldsútreiðslum orsakað av fjarstøðu Føroya, soleiðis at føroyskar skipasmiðjur hava eitt møguleika at kappast við útlendskar skipasmiðjur. Harumfram er ætlanin heilt ella partvíst at endurrinda fyri innflutningsgjøld av tilfari í samband við bygging ella umbygging.

Orsakað av avmarkingum í verandi lógum um stuðul til skipabygging, við tað at tað bert er veitt t.d. til fiskifør ella farmaskip, soleiðis at onnur før, ið ikki eru fiski- ella farmaskip, ikki hava verið umfatað av lóggávuni, hevur landsstýrið í sambandi við endurskoðanina av studningsskipanini skotið upp, at endurrinding av toll- og farmagjaldsútreiðslum skal umfatað bygging av øllum sløgum av førum v.m. Endurrindingin kann eisini veitast í samband við umbygging, tá umbyggingarvirðið er 3 mió. kr. ella meira.

Tað skal eisini viðmerkjast, at landsstýrið við hesum uppskotinum miðjar ímóti, at stuðulslóggávan til skipabygging verður bitað sundur í tveir partar, soleiðis at annar parturin bert viðgerð stuðul til skipafiskiskipaflotanum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 83 frá 13. juni 1995, §§ 2 og 3 í løgtingslóg nr. 83 frá 9. juni 1990 um stuðul til bygging av farmaskipum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 83 frá 13. juni 1995 og løgtingslóg nr. 47 frá 08. mai 1991 um stuðul til bygging av skipum, bátum og flótandi eindum til alivinnuna á føroyskum virkjum.
Stk. 3. Tilsøgnir um stuðul givnar áðrenn henda lóg kemur í gildi, verða viðgjørdar eftir higartil galdandi lóggávu.smiðjur, meðan hin møguligi parturin bert viðgerð stuðul til hyggiharrar.

Heimildin til at játta fulla ella partvísa endurrinding av toll- og farmagjaldsútreiðslum skal liggja hjá landsstýrinum, men skulu allar umsóknir sambæt løgtingslóg nr. 69 frá 9. juni 1988 um sáttmálaeftirlit sendast sáttmálastovninum til viðgerðar, t.v.s., at stovnurin skal geva landsstýrinum tilráðingar í teimum einstøku byggimálunum.

Tað skal viðmerkjast, at á fíggjarlógini fyri 1996 § 14, rakstrarstað: 18496, eru avsettar í sambandi við skipsbyggiendurgjøld 1,2 mió. kr. Viðvíkjandi Sáttmálaeftirlitinum eru avsettar á § 13, rakstrarstað: 18598, kr. 50.000,-.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

Ad. § 1. Hugsanin er, at hugtakið flótandi eindir skal umfatað øll vanlig byggiarbeiðir á skipasmiðjum, t.d. bygging og umbygging av skipum, bátum, prúmum, lossingarbátum, flótikranum og líknandi. Viðvíkjandi umbygging er sett eitt minstamark, soleiðis at landsstýrið kann veita studning, tá umbyggingarvirðið er 3 mió. ella meira.

Skipanin við endurrinding av farmagjaldsútreiðslum er eisini ætlað at galda fyri smærri virkir, ið fáast við bátabygging eitt nú virki, ið framleiða glastrevjabátur.

Ad § 2. Sambæt Toll- og Skattstovuni fellur tollur burtur á innfluttum vørum, ið hava uppruna í londum, sum vit hava handilssáttmála við, tvs., ES og EFTA londini. Sum skjalprógv krevst ein upprunaváttan frá avsendaranum, ið kann vera eitt EUR 1 sertifikat ella ein fakturaváttan. Innfluttar vørur úr londum, ið Føroyar ikki hava handilssáttmála við, sum t.d. Japan og USA sleppa ikki undan at rinda toll við innflutning, um tollur er á vørum. Meirvirðisgjald er eisini á innfluttum vørum, men er innflyturin skrásettur fyri mvg, fær hann afturgoldið munin millum keyps-mvg og sølu-mvg. Tí er skotið upp, at studningur kann veitast til endurrinding av innflutningsgjøldum av tilfari við upp til 3,5%. Sum kunnugt varð áður veitt upp til 13%, men orsakað av omanfyri nevndu, verður satsurin broyttur til 3,5 % eftir tilmæli frá Sáttmálastovninum.
Ad § 3. Landsstýrið ásetur við kunngerð nærri reglur um mannagongd í sambandi við umsóknir um studning

eftir hesi lóg.

Ad § 4. Reglur um strikan av samsvarandi greinum í øðrum lógum og reglur um fgildissetan.

Ad § 4. stk. 1. Gildiskoman er sett at vera 1. januar 1996 til tess at tryggja, at møgulig umsókn fyrr í árinum kann koma undir lógina.

1. viðgerð 16. apríl 1996. Málið varð beint í vinnunevndina, sum 19. apríl 1996 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 25. mars 1996 og eftir 1. viðgerð tann 16. apríl 1996 beint í vinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og **ein samd nevnd** tekur undir við tí og mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 29. apríl 1996. Samtykt við 25-0-0 atkvøðun at beina málið til 3. viðgerð.

3. viðgerð 8. mai 1996. Málið endaliga samtykt við 23-0-0 atkvøðun.

Løgtingslóg nr. 73. 20. mai 196.

80 Løgtingslóg um mánaðarminstuløn og útróðrarmenn

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Ivan Johannesen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um mánaðarminstuløn til útróðrarmenn.

§ 1. Rætt til mánaðarminstuløn hava teir persónar sum rógva við vinnuliga riknum útróðrarfari.

§ 2. Mánaðarminstaløn verður latin hvørjum manni, jvb. stk. 2, manningartal roknað eftir stødd á bátinum treytað av, at báturin hevur avreitt fyri minst kr. 84.000 uppá mannin í undanfarna álmanakkaári ella minst kr. 42.000 uppá mannin í undanfarna hálvári.
Stk. 2. Útróðrafør, býtt eftir stødd, hava í mesta lagi loyvi til at hava nevndin manningartøl undir mánaðarminstuløn:

1) Bátar minni enn 10 BRT upp til 3 mans.
2) Bátar 10 - 14,99 BRT upp til 4 mans.
3) Bátar 15 - 19,99 BRT upp til 5 mans.

§ 3. Mánaðarminstalønin er kr. 7.500 um mánaðin fyri hvønn mannin. Mánaðarminstalønin verður minkað krónu fyri krónu, tá manningarpartur, ognur inntøka og mánaðarminstaløn samanlagt fyri mánaðin er størri enn størsta útgjald frá Arbeiðsloysisskipanini.
Stk. 2. Manningarpartur samtbert hesi lóg er 43 prosent av avreiðingarvirðinum býtt við manningartalinum, tó í mesta lagi manningartalinum í § 2. Stk. 2.
Stk. 3. Er avreiðingarvirðið undanfarna tríggjar mánaðirnar minni enn kr. 12.000 uppá mannin, verður eingin mánaðarminstaløn útgoldin.
Stk. 4. Full mánaðarminstaløn verður útgoldin til persónar, sum hava verið við allar túrarnar í mánaðinum. Persónar, sum ikki hava verið við allar túrarnar í mánaðinum, fáa mánaðarminstuløn í mun til túratalið, tó í mesta lagi upp til kr. 606,88 um dagin.

§ 4. Hendan lóg fær gildi 1. apríl 1996.

Viðmerkingar:

Ætlanin við lógaruppskotinum er at seta í gildi eina mánaðarminstuløn fyri útróðramenn ístaðin fyri skipanina við minstaforvinningi.

Ein royndarskipan við mánaðarminstuløn til útróðrarmenn varð royndi í tveimum umførum. 1. mars - 30. apríl 1994 og 1. november 1994 - 28. februar 1995. Minstaløtnin undir royndarskipanini var kr. 7.500 um mánaðin, sum varð minka krónu, fyri krónu tá samlaða inntøkan fyri mánaðin fór uppum kr. 12.725. Av tí, at markið fyri "avtrapping" av minstuløtnini gjørdi, at skipanin gjørdist nógv dýrari, enn hon vil verða smb. hesum uppskoti, har "avtrappingin byrjar, tá samlaða inntøkan fyri mánaðin fer uppum uml. kr. 8.900. Kostnaðurin av royndarskipanini var slakar 2 mill. kr. um mánaðin. Royndarskipanin gav tó ikki røttu myndina av, hvat skipanin vildi kosta, av tí, at skipanin við minstaforvinningi var í gildi samstundis og at fleiri heldur valdu at vera undir hesi skipan.

Veikleikin við skipanini við minstaforvinningi, sum verður avroknað fyri hvønn útróðrartúrin sær, er, at teir bestu bátarnir, ið sum oftast eisini hava størsta dagatalið, í nógvum førum hava lingið størstu upphæddirnar útgoldnar úr Lønjavningargrunnintum.

Sannlíkt er, at útgaldingarnar til teir bestu bátarnar vil minka undir nýggju skipanini, meðan útgjaldingarnar til bátarnar í verra endanum ivaleyst fara at vaksa, tá dagatalið ikki verður avgerðandi.

Ætlanin er, at skipanin bert skal verða galdandi fyri bátar, sum smb. kunngerð verða roknaðir sum vinnuliga riknir. Eftir hagtølunum fyri 1995 verður talan um umleið 170 bátar við umleið 320 ársverkum. Við sama fiskiskapi, prísum og atfer fer kostnaðurin av skipanini at vera umleið 11,2 mill. kr. um árið, ella kr. 35.000 uppá mannin. Her verður roknað við, at útróðrarmenn í meðal førvinna kr. 10.000 úr aðrari vinnu.

Viðmerkjast skal, at í 1995 vórðu uml. 17 mill. kr. útgoldnar í inntøkutrygd til útróðrarfør undir 20 BRT, talan var um 491 menn, og svarar til uml. kr. 34.000 uppá mannin.

Við minkandi fiskiskapi, minkandi fiskaprísum kann skipanin gerast munandi dýrari, enn tær 11,2 mill. kr. Ósannlíkt er ikki, at kostnaðurin við sama manningartalið kann koma uppá umleið 20 mill. kr. um árið ella uml. kr. 62.000 uppá mannin.

Havast má í huga, at skipanin á ein hátt kann roknast sum ein fastlønarskipan, sum kann eggja til, at vinnuliga riknu útróðrarbátarnir fara at sigla alt árið við mest loyvda manningartalinum. Verður hettar so, kann talan verða um 500 árverk sum kunnu kosta 25 - 30 mill. kr. um árið í mánaðarminstuløn.

1. viðgerð 9. apríl 1996. Málið verð beint í vinnunevndina, sum 7. mai 1996 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 25. mars 1996 og eftir 1. viðgerð 9. apríl 1996 beint í vinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meirluta og trúggjar minnilutar.

Meirlutin (Henrik Old, Jákup Joensen, Óli Jacobsen og Álvur Zachariasen) tekur undir við málinum. Meirlutin mælir til at gera brboytingar í grein 2 við áseting av minsta krónurtali fyri avreiðingar og mestt loyvda manningartali undir mánaðarminstuløn. Meirlutin mælir eisini til, at lógin fær gildi 1. juni 1996. Meirlutin mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins við nevndu broytingum og setir tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

1) § 2 verður soljóðandi:
"§ 2. Mánaðarminstaløn verður latin manningartal roknað eftir støld á bátinum, treytað av at bbáturi hevur avreitt eitt minsta krónutal, sum naiðanfyri nevnt, uppá mannin í undanfarna álmannakkaári ella undanfarna hálvári.

1. maður: kr. 84.000 fyri álmanakkaári ella kr. 42.000 í undanfarna hálvári
2. maður: kr. 64.000 fyri álmanakkaári ella kr. 32.000 í undanfarna hálvári.
3. maður: kr. 50.000 fyri álmanakkaári ella kr. 25.000 í undanfarna hálvári.
4. maður: kr. 50.000 fyri álmanakkaári ella kr. 25.000 í undanfarna hálvári.
5. maður: kr. 50.000 fyri álmanakkaári ella kr. 25.000 í undanfarna hálvári
6. maður: kr. 50.000 fyri álmanakkaári ella kr. 25.000 í undanfarna hálvári

Stk. 2. Útróðrarfør, býtt eftir støðd, hava í mesta lagi loyvi til at hava nevndu manningartøtl undir mánaðarminstuløn:
1) Bátar minni enn 10 BRT upp til 4 mans.
2) Bátar 10-14,99 BRT upp til 5 mans.
3) Bátar 15-19,99 BRT upp til 6 mans.

2) § 4 verður soljóðandi:
"§ 4. Henda lóg kemur í gildi tann 1. juli 1996."

Minnilutin (John Petersen) vísir á løglingsmál nr. 36/1996: Løgtingslóg um mánaðarligan minstaforvinning til skrásettar útróðrarmenn, sum umhandlar sama mál og mælir til at samtykkja tað. Tí setir minniluting (John Petersen) einki uppskot fram.

Minnilutin (Heini O. Heinesen) tekur ikki undir við málinum og vísir á løglingsmál nr. 36/1996: Løgtingslóg um mánaðarligan minstaforvinning til skrásettar útróðrarmenn.

Minnilutin (Lasse Klein) heldur tað vera skeivt at gera mun á útróðrarmonnum, sum rógva við bátum undir og yvir 20 BRT. Teir eigaa allir at koma undir sonn minstulønarskipan. Minnilutin (Lasse Klein) tekur tí hvørki undir vivð uppskoti landsstýrisins ella broytingaruppskoti meirilutans, og mælir heldur til at samtykkja løgtingsmál nr. 36/1995: Løgtingslóg um mánaðarligana minstaforvinning til skrásettar útróðrarmenn, sum vil veitta útróðrarmonnum frægari søndir enn uppskot meirilutans.

2. viðgerð 13. mai 1996. Broytingaruppskot meirilutans fekk 8-3—14 atkvøður og fall. Uppskot landsstýrisins fekk 10-1-14 atkvøður og fall.

81 Endurgjaldsgrunnur alivinnuna

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Ivan Johannesen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um endurgjaldsgrunn til alivinnuna.

§ 1. Stovnsettur verður Endurgjaldsgrunnur Alivinnunar, sum kann veita endurgjald fyri tiltøk, fram. smbr. § 7 í løgtingslóg nr. 26 frá 30. apríl 1987 um sjúkur hjá fiski, skeljadýrum og krabbadýrum við seinni broytingum.

§ 2. Tá ið landsdjóralæknin eftir góðkenning frá landsstýrinum gevur boð um at fiskur verður avlívaður, kann endurgjald verða veitt úr Endurgjaldsgrunninum, tó bert í førum, har trygging ikki tekur við.

§ 3. Grunnurin hevur nevnd við 3 limum. Ein nevndarlimur skal hava fíggjarligt innlit og tveir skulu hava kunnleika til alivinnuna.
Stk. 2. Tveir av limunum verða tilnevndir av landsstýrinum og ein av Havbúnaðarfelagnum. Valið er galdandi í 4 ár.
Stk. 3. Fiskivinnumunsitingin tekur sær av dagliga rakstrinum av grunninum.

§ 4. Endurgjald verður ásett av nevndini.
Stk. 2. Grunnurin ber útreiðslurnar av virðismeting um.
Stk. 3. Virðið á fiski verður at áseta sum 70% av standard endurgjaldsvirðinum hjá tryggingini. Av upphædd fer møguligt søluvirði á tí avlívaða fiskinum.

§ 5. Eigarar av fiski, skelja- og krabbadýrum, ið av grovum ósketni hava verið atvoldin til, at fiskur er smitaður ella sjúkur, fáa ikki endurgjald frá grunninum.

§ 6. Fíggjarliga grundarlag grunsins er gjald frá alarum og árliga játtanin á løgtingsfíggjarlógini. Alarar gjalda 1 part meðan landskassin rindar 2 partar. Smoltalarar og alarar á sjónum gjalda helvt um helvt.
Stk. 2. Inngoldið verður fyri fíggjarárini 1996, 1997 og 1998. Síðani skal grunnurin hvíla í sær sjálvum.
Stk. 3. Alarar, ið hava loyvisbrev at reka aling á sjónum og/ella smoltstøð, hava skyldu at gjalda inn í grunnin.
Stk. 4. Inngjaldið frá landskassanum verður 40 oyru fyri hvørt sjósett smolt. Frá vinnuni verður inngjaldið 10 oyru frá smoltstøðunum fyri hvørt sjósett smolt og 10 oyru frá alistøðun fyri hvørt sjósett smolt.
Stk. 5. Gjaldið frá vinnuni sum nevnt er í hesi grein, kann krevjast inn við panting.

§ 7. Landsstýrið ásetir í kunngerð nærri reglur um virki grunsins íroknað uppkrevjingarhátt o.a.

§ 8. Heldur nevndin, at endamálið við grunninum ikki er til longur, ger nevndin tilmæli til landsstýrið um at taka grunnin av.
Stk. 2. Landsstýrið tekur í hesum føri støðu til, hvussu verða skal við ognum grunsins.

§ 9. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
Stk. 2. Samstundis fer úr gildi § 7, stk. 4-6 og § 8 í løgtingslóg nr. 26 frá 30. apríl 1987 um sjúkur hjá fiski, skeljadýrum og krabbadýrum við seinni broytingum.

Viðmerkingar:

Eftir ábeitun frá Havbúnaðarfelagnum verður settur á stovn ein endurgjaldsgrunnur, ið skal nýtast, tá fiskur verður avlívaður orsakað av sjúku. Málið um at skipa endurgjaldsgrunn fyri alivinnuna hevur fyrr verið frammi á tingi við løgtingsmáli nr. 107 frá 1988 og nr. 19 og 20 frá 1989, men hesi eru ikki samtykt.

Havbúnaðarfelagið mælir til, at skipanin skal vera tvungin fyri allar partar, soleiðis at alarar á sjónum, smolt-

stødir og landsstýrið gjalda hvønn sín part í ein grunn og at býtið ímillum landsstýrið og vinnuna er 2:1. Ásett verður eitt oyragjald á fíggjarlógini í 1996 uppá 20 oyru/stk. frá vinnuni og 40 oyru/stk. úr landskassanum fyri hvørt útsett smolt, og skal hendan upphæddin vera grundarlag fyri fíggjarlógini 1997, sumuleiðis skal avgjald, sum alarin skal gjalda í 1997 verða grundarlag fyri fíggjarlógini í 1998. Aftaná skal grunnurin hvíla í sær sjálvum.

Fíggjarligar avleiðingar.

Ítrupult er at siga, hvussu nógv smolt fer á sjógv í 1996. Sostatt er neyðugt at taka støði í einum miðtum tali, sum síðani verður regulerað. Á fíggjarlógaruppskotinum fyri 1996 er støðið tikið í, at 7 mió. smolt fer á sjógv. Hetta gevur 2,8 mió. kr. í landskassans parti í grunnin, og 1,4 mió. kr. frá alarum, t.v.s. í alt 4,2 mió. kr. verða goldnar í grunnin í 1996.

Galdandi lóggáva.

Løgtingslóg nr. 26 frá 30. apríl 1987 um sjúkur hjá fiski, skelja- og krabbadýrum.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

§§ 1 og 2. Endurgjaldsgrunnurin verður settur á stovn og kemur at fíggja endurgjald til alarar fyri avlívaðan alifisk. Orð lógarinnar merkja, at grunnurin bert skal gjalda í teimum førum, har tryggingin sambæri polisutreytum ikki tekur við - tó soleiðis, at grunnurin ikki skal gjalda tað, ið svarar til sjálvsábyrgd alarans.

Um alari ikki hevur tryggjað fiskin, fær hann ikki endurgjald úr grunninum fyri tann partin av virðinum á fiskinum, sum hann eftir vanligum tryggingartreytum kundi fingið frá tryggingini. Ei heldur fær hann fyri upphædd, sum eftir vanligum tryggingartreytum skuldi verið roknað sum sjálvsábyrgd.

1. viðgerð 16. apríl 1996. Málið varð beint í vinnunevndina, sum 2. mai 1996 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 25. mars 1996 og eftir 1. viðgerð 19. apríl 1996 beint í vinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við umboð fyri Havbúnaðarfelagið og fyri tryggingina.

Nevndin hevur býtt seg í tríggjar minnilutar.

Minnidutin (Henrik Old, Jákup Joensen og Heini O. Heinesen) tekur undir við málinum, men mælir til, at alarar og landskassin gjalda eins stóran part inn í grunnin. Minnilutin vísir á, at í løgtingslóg nr. 26 frá 30. apríl 1987 um sjúkur hjá fiski, skelja- og krabbadýrum er ásett, at setast skal á stovn ein endurgjaldsgrunnur. Higartil hevur landskassin borið allar útreiðslurnar av endurgjaldið fyri fiskasjúkur. Landsstýrið mælir til, at inngjaldið til grunnin verður tilsamans 60 oyru fyri hvørt sjósett smolt, 40 oyru frá landskassanum, 10 oyru frá smoltstøðunum og 10 oyru frá alistøðunum. Minnilutin mælir til, at inngjaldingin til grunnin verður broytt soleiðis, at landskassin skal rinda 30 oyru, meðan smoltstøðir og alistøðir rinda hvør sínt 15 oyru. Árliga inngjaldið til grunnin verður tað sama, men upphædd landskassans minkar við 700.000 kr. úr 2,8 mió. kr. til 2,1 mió. kr. Við hesum broytingum mælir minnilutin (Henrik Old, Jákup Joensen og Heini O. Heinesen) løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins og setir tí fram soljóðandi

broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

1) § 6, stk. 1, 2. punktum verður orðað soleiðis: "Alarar og landskassin gjalda ein part hvør.".

2) Í § 6, stk. 4 verður í staðin fyri "40 oyru", "10 oyru" og "10 oyru" sett "30 oyru", "15 oyru" og "15 oyru".

Minnilutin (Anfinn Kallsberg, Óli Jacobsen og Lasse Klein) vísir á, at fyriliggjandi uppskot er ein náturlig avleiðing av løgtingslóg nr. 26 frá 30. apríl 1987 um sjúkur hjá fiski, skelja- og krabbadýrum.

Tá landsstýrið og alivinnan hava gjørt semju um hvussu stovnsfæ skal útvegast grunninum, fer minnilutin (Anfinn Kallsberg, Óli Jacobsen og Lasse Klein) at mæla løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Álvur Zachariasen) tekur ikki undir við málinum, tí hetta er mál, ið tryggingin eigur at taka sær av.

2. viðgerð 8. mai 1996. Broytingaruppskot minnilutans varð samtykt við 13-3-9 atkvøðum. Samtykt við 23-3-0 atkvøðum at beina málið soleiðis broytt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 14. mai 1996. Málið endaliga samtykt við 21-6-2 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 87, 28. mai 1996.

F.L. j.nr. 2600-5/91.

82 Løgtingslóg um íløgustuðul til alivinnuna

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Ivan Johannesen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um íløgustuðul til alivinnuna.

§ 1. Heimilað verður landsstýrinum í fíggjarárinum 1996 og 1997 at nýta 10 mió. kr. til íløgustuðul til alivinnuna.

Stk. 2. Stuðulin kann játtast:

1) Smoltstøðunum til at betra um vatngóðskuna.
2) Til endurnýtslu av slátturruski frá vinnuni.
3) Til framleiðslu av síla og laksarognum.
4) Til mennan av nýggjum mannagongdum, ið kunnu vera við at minka um spjaðing av smittu.
5) Ella annað, ið kann betra um rakstur hjá alivinnuni og á annan hátt koma alivinnuni til gagns í framtíðini.

§ 2. Til verkætlanina samb. § 1 kann veitast úr 25-50% av skjalprógvaðum útreiðslum.

§ 3. Stuðul kann játtast eftir umsókn, har verkætlan fyriliggur.

Stk. 2. Stuðul verður bert latin til fløgur og ikki til rakstur.
Stk. 3. Stuðul verður útgoldin tá skjalprógv fyriliggja um at verkætlanin er farin í gongd.

§ 4. Landsstýrinum verður heimilað í kunngerð at áseta, hvør hevur umsitingina av stuðlinum um hendi.

§ 5. Hendan lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar:

Íløgustuðul hevur verið veittur í 3 ár eftir løgtingslóg nr. 73 frá 2. apríl 1993 um íløgustuðul til alivinnuna. Stuðulin varð veittur sum beinleiðis smoltstuðul, kr. 5, fyri hvørt útsett smolt. Endamálið við stuðlinum var at fáa vinnuna, sum tá var illa fyri, at menna seg aftur. Tí bleiv løgtingslóg samtykt, sum heimilaði landsstýrinum at veita ein tíðaravmarkaðan stuðul til alivinnuna. Trý ára skeiðið er liðið, og er lógin farin úr gildi.

Hóast stuðulin hevur virkað eftir ætlan, soleiðis at vinnan er munandi betur fyri nú, verður mett, at tørvur er á stuðli í tvey ár afturat, og í viðmerkingum til fíggjarlógina fyri 1996 stendur, at landsstýrið fer at leggja uppskot fyri løgtingið um framhaldandi íløgustuðul undir broyttari skipan, sum skal verða galdandi í tvey ár.

Nú alarar á sjónum hava fingið stuðul í trý ár, verður mett, at smoltstøðirnar nú standa fyri tørni. Beinleiðis smoltstuðul hevur ikki hildið verið so heppið uppá longri sikt, tí verður mett, at stuðul í verkætlanum sum koma at hava eitt varandi virði fyri alaran, er sunnari fyri vinnuna enn beinleiðis stuðul.

Smoltstøðirnar hava trupuleikar við at ov lítið vatn er til og at góðskan er ov vánalig, t.v.s. at smittuvandin er ov stórur. Hetta kann hjálpast uppá við at recirkulera og reinsa vatnið. Hetta kemur at betra um smoltgóðskuna, og minka um smittuvandan, og á tann hátt geva bæði smoltstøðum og alarum á sjónum fíggjarligan fyrimun í framtíðini.

Punk 5 er tikið við fyri at skilagóð projektir, ið kunnu koma alivinnuni til gagns, eisini kunnu fáa stuðul. Her skal tó undirstrikast, at hugsað verður ikki um íløgustuðul.

Átrokandi hevði eisini verið at fingið endurvunnið sláturaffallið frá alivinnuni eitt nú til tøð og annað, her kann eisini vinningur fáast burturúr.

Aðrastaðni eru sera góðar royndir gjørdar við at ala síl og laks til rognaframleiðslu. Hetta kundi verið vert at stuðla, um onkur av verandi alarum hevði hug at farið undir slíka framleiðslu.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar.
§ 1. Á § 16, 16904/333407: Tiltøk fyri alivinnuna eru 10 mió. kr. settar av til íløgustuðul til alivinnuna. Í viðmerkingunum stendur, at tørvur er á stuðli í tvey ár. Lógaruppskotið byggir á, at 10 mió. kr eisini verða settar av til endamálið í 1997.

Stk. 2. Sí omanfyri.

§ 2. Fyri at umsóknin kann viðgerast, skal ein verkætlan við kostnaðarmeting fyriliggja.

§ 3. 25-50% verða latin í stuðli av fløgunum til verkætlanina og ikki raksur. Til endurnýtslu av sláturaffalli og til rognaframleiðslu kann stuðul eisin veitast til marknaðarkanningar og vørumenning.

§ 4. Menningarstovan ella "umsiling av vinnuframskipanum" umsitur stuðulin.

1. viðgerð 16. apríl 1996. Málið varð beint í vinnunevndina, sum 8. mai 1996 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 25. mars 1996 og eftir 1. viðgerð 16. apríl 1996 beint í vinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við umboð fyri Havbúnaðarfelagið. Umboðini fyri Havbúnaðarfelagið, ið hæði vóru smoltframleiðarar og alarar, vístu á, at tað er allingin á sjónum, sum hevur stuðul neyðugan, og mælti frá at samtykkja fyriliggjandi uppskot. Nevndin hevur eftir fundin fingið bræv frá Havnbúnaðarfelagnum, har felagið kemur við broytingaruppskotum til uppskotið.

Nevndin hevur býtt seg í ein meirilurta og ein minniluta.

Meirilutin (Jákup Joensen, John Petersen, Óli Jacobsen, Lasse Klein og Álvur Zachariasen) kundi hugsað sær at sett fram broytingaruppskot til uppskot landsstýrisins, soleiðis at prinsippið í gomlu lógini eisini var útgangsstøði fyri stuðlinum til alivinnuna, sum er játtað á fíggjarlógini fyri 1996.

Tá hetta ikki er gjørligt sambært løgfrøðiligu útlegging av stýriskipani (manglandi identitet) hava 17 løgtingsmenn lagt málið fram av nýggjum.

Minnilutin (Henrik Old og Heini O. Heinesen) tekur ikki undir við málinum og vísir á, at íløgustuðul til alivinnuna hevur verið veittur eftir løgtingslóg nr. 73 frá 2. apríl 1993 um íløgustuðul til alivinnuna. Lógin heimilaði landsstýrinum at veita ein tíðaravmarkaðan stuðul í trý ár og er hetta trý ára skeiðið liðið og er lógin farin úr gildi. Alarar vísa á, at fyriliggjandi uppskot ikki er til bata fyri alivinnuna, tí neyðugt verður at útvega nógva eginfígging, ið er torfør, fyri ikki at siga ógjørlig, at fáa.

Henrik Old mælit til at beina málið aftur til landsstýrið, soleiðis at landsstýrismaðurin fær høvi til at koma aftur til tingið við nýggjum uppskoti.

2. viðgerð 10. mai 1996. Uppskotið fekk 0-4-16 atkvøður og fall.

F.L. j.nr. 2600-1/90.

83 Broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 1. nr. 9) verður orðað soleiðis:
"Vinnurekandi grunnar, sínámillum tryggingarfeløg og endurtryggingarfeløg."

2) § 29, nr. 3) verður orðað soleiðis:
"Gávur, sum hin skattskyldugi hevur fingið frá hjúnafelaga og gávur, sum eru fevndar av lóg um arvaavgjald, somuleiðis ognarvøkstur, ið stavar frá arvi og greiðslu frammanundan burtur av arvi, falnum og ófalnum, ella av tí, at eftirsitandi hjúnafelagi tekur við felagsbúgvi til at sita í óskiftum búgvi."

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, men er broytingin í nr. 1 galdandi frá 1. januar 1995.

Viðmerkingar:

Til § 1, nr. 9). Landsstýrið ynskir við uppskotinum skattliga at líkastilla vinnurekandi grunnar við størri vinnurekandi feløg.

Broytingin í § 1, nr. 1 hevur við sær, at vinnurekandi grunnar við gildi frá 1. januar 1995 skulu rinda 27% í skatti av skattaskyldugu inntøkuni. Grunnarnir verða við hesum síðustillaðir við vinnurekandi feløg, hvørs partapeningur er 80.000 kr. ella hægri og tryggingar- og endurtryggingarfeløg.

Fíggjarligar avleiðingar:

Hetta uppskotið hevur við sær, at landskassin væntandi fer at missa skattainntøkur uppá 1-2 mió. kr. árrliga.

Sambært galdandi lóg, eru gávur, sum latnar verða millum skyldfólk í beinari linju upp og niður, skattafríar.

Í uppskoti um broyting av lóg um arvaavgjald, skulu hjúnafelagir framyvir ikki rinda arvaavgjald av arvi eftir hin hjúnafelagan, meðan eftirkomarar, (t.d. gáva frá foreldrum til børn) framyvir koma undir at rinda sama avgjald av gávu, sum av arvi.

Eftir hesi broyting verða gávur, sum verða latnar av avkomi uppeftir, (t.d. frá børnum til foreldur) skattskyldugar, meðan gávur millum hjúnafelagar, framvegis vera skattafríar.

Ognarvøkstur, ið stavar frá arvi og arvaforskoti, ella av tí at eftirsitandi hjúnafelagi tekur við felagsbúgvi til at sita í óskiftum búgvi, verður eisini framyvir skattafríur.

Fíggjarligar avleiðingar:

Mett verður, at lógarbroytingin gevur landskassanum eina meirinntøku uppá 4-5 mió. kr. í meðal árliga.

1. viðgerð 11. apríl 1996. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 26. apríl 1996 legði fram soljóðandi

Á l i t

Málið er lagt fram av Føroya Landsstýri tann 25. mars 1996 og varð eftir 1. viðgerð 11. apríl 1996 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og undir viðgerðini býtt seg í ein meirluta og ein minniluta.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Álvur Zachariasen, Finnbogi Ísaksson og Kristian Magnussen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins.

Minnilutin (Finnbogi Arge, Tordur J. Niclasen og Jørgen Niclasen) vísir á , at vinnurekandi grunnar aðrastaðni - eitt nú í Danmark - eru skattafríir, og heldur minnilutin, at føroyingar eiga at hava somu møguleikar sum danir á hesum øki. Minnilutin setur tí fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

1) "Í § 3, stk. 1, verður sum nýggj litra g) innsett:

"Vinnurekandi grunnar. Landsstýrið ásetir í kunngerð nærri reglur hesum viðvíkjandi."

Henda broyting førir við sær, at vinnurekandi grunnar í Føroyum verða skattafríir. Um so er, at uppskot minnilutans ikki vinnur frama á tingi, tekur minnilutin undir við uppskoti landsstýrisins.

Viðv. § 1, 2) vísir minnilutin á, at hann ikki kann taka undir við hesum, vísandi til at henda broyting viðførir eina breiðkan av skattagrundalagnum, og hetta er ikki í samsvar við tann júst framda skattahetta.

2. viðgerð 13. mai 1996. Broytingaruppskot minnilutans fekk 8-0-19 atkvøður og fall. Uppskot landsstýrisins pkt. 2 fekk 0-0-27 atkvøður og fall. § 1 soleiðis broytt samtykt 25-0-1 atkvøðum. § 2 samtykt við 17-9-0 atkvøðum. Samtykt við 26-0-0 atkvøðum at málið kann fara til 3. viðgerð.

14. mai 1995 varð loyvi tingsins fingið at víkja frá tíðarfreistini millum 2. og 3. viðgerð. Samtykt við 29-0-0 atkvøðum.

3. viðgerð 15. mai 1996. Málið endaliga samtykt við 29-0-0 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 83, 28. mai 1996.

F.L. j.nr. 2540-33/95.

84 Løgtingslóg um stuðul til menning av fiskivinnu á landi

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Ivan Johannesen, landsstýrismaður, fram saljóðlandi

Uppskot

til

Løgtingslóg um stuðul til menning av fiskivinnu á landi.

Kapittul 1
Virking av vørum úr 3. lands fiski.

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað at veita fiskavirkjum stuðul til keyp av frystum 3. lands fiski, krabbadýrum og skeljadýrum til virkingar í Føroyum.
Stk. 2. Stuðul kann játtast eftir umsókn, har allur týðandi upplýsingar um rávørukeypið og ætlaðu framleiðsluna eru hjálagdar. Játtast kann í mesta lagi 1,25 kr. fyri hvørt kg av fiski, krabbadýrum og skeljadýrum, innflutt verður.
Stk. 3. Stuðulin kann útgjaldast sambæt skjalprógvum fyri innflutningin.

Kapittul 2
Stuðul til vørumenning o.a.

§ 2. Landsstýrinum verður heimilað at veita stuðul til menning av føroyskum fiskavirkjum.
Stk. 2. Endamálið við stuðlinum er at virka fyri øktari framleiðslu og umlegging til framleiðslu av hávirðisvørum á kappingarførum grundarlagi.
Stk. 3. Stuðul kann játtast til verkætlanir, ið miða móti menning av rávøruútvegan, framleiðslu, vørumenning og sølumenning.
§ 3. Treytin fyri stuðuli er:
a) at løgd verður fram útgreind frágreiðing um verkætlanina, tíðarætlan, kostnaðarætlan og rakstrarætlan.
b) at verkætlanin kann menna fiskavirkingina á landi og gevur virðisøking til samfelagið.
c) at umsøkjarin leggur fram neyvar upplýsingar um fíggjarstøðu sína.

§ 4. Játtast kann stuðul upp til 1/3 av kostnaðinum til íløgur í útgerð og upp til 50% av øðrum kostnaðum.

Kapittul 3
Felagsreglur

§ 5. Landsstýrið kann í kunngerð áseta nærri reglur fyri veitan av stuðuli sambæt hesi lóg, herundir at áseta eitt býti av játtanini millum stuðul eftir kapittul 1 og stuðul eftir kapittul 2.

§ 6. Henda lóg fær gildi frá 1. januar 1996.

Viðmerkingar:

Landsstýrið hevur á fundi 13. februar 1996 sett arbeiðsbólk at gera uppskot til løgtingslóg um stuðul til menning av fiskivinnu á landi og uppskot til heildarætlan fyri av innflutum fiski. Arbeiðsbólkurin er soleiðis mannaður: Meinhard Jacobsen frá P/f Føroya Fiskavirking, Petur Mohr frá P/f Kósin, Johannes Jensen frá P/f Føroya Fiskavirking, Petur Mohr frá P/f Kósin, Johannes Jensen frá P/f Faroe Seafood Prime, Súni Poulsen frá Menningarstovuni, Ulla Svarrer Wang frá Landsskrivstovuni (Deildin fyri fiski- og aðrari vinnu) og skrivari Erling í Liða frá Landsskrivstovuni (Búskapardeildin).

Arbeiðsbólkurin hevur nú avgreitt fyrru uppgávuna, tí tað hevur skund at fáa heimild at veita játtanir. Tað hevði óivað verið rættari at gjørt eina heildarætlan fyri virking av innflutum fiski. Arbeiðsbólkurin hevur tó, í tann mun tað hevur verið gjørligt, tikið hædd fyri sjónarmiðum, sum fara at koma fram undir viðgerð av eini heildarætlan.

Løgtingslóg um menning av fiskivinnu á landi hevur tveir høvuðspartar: Kapittul 1, sum fevnir um stuðul til virking av vørum úr 3. landsfiski og kapittul 2, sum fevnir um menning av fiskivinnu á landi yvirhøvur.

Tá tað snýr seg um virking av vørum úr 3. landsfiski, hava virkir nú í nøkur ár fingist við hesa framleiðslu. Hóast stórur dentur hevur verið lagdur á at fáa hesa framleiðslu at bera seg, skulu virkini tó náa væl betri úrslitum, áðrenn tey kunnu klára seg uttan studning frá landsstýrinum. Samanburtikið er munurin millum keyp og sølu minni, tá virkað verður úr frystum fiski, enn tá virkað verður úr feskum fiski, og eru fleiri orsøkir til hetta.

Virkini eiga tí at leggja enn størri herðslu á lønsemið í framleiðsluni úr 3. landsfiski. Hetta kann bara gerast við einari miðvísari menning innan øll lið í virkingini, frá fiskurin verður keyptur, til lidna vøran verður seld. Arbeiðsbólkurin heldur tí, at størri dentur eigur at verða lagdur á at fáa kapittul 2 í lógini um stuðul til vørumenning o.a. at virka, soleiðis at útvegir kunnu skapast fyri at studningurin, sum frá líður, gerst óneyðugur.

Tað, sum frammanfyri er sagt um neyðuga størri menning innan framleiðslu og sølu av vørum úr 3. landsfiski, er eisini galdandi fyri vørur úr føroyskum fiski. Tørvurin á menning innan øll lið í virking og sølu er ovurstórur. Arbeiðsbólkurin er av teimi áskoðan, at virkini eiga at leggja størri dent á heildina í teimum ætlanum, tey seta í verk. Hetta merkir, at hugsast skal um at styrkja øll veik lið í virkingini, líka frá útvegan av rávøru til sølu og flutning av lidnum vørum.

Tá leggjast skal um til virking av hávirðisvørum, tørvur virkjunum í stóran mun aðra útgerð enn ta verandi, fyri at framleiðslan kann gerast rasjonel og lønandi. Men virkjunum tørvar eisini kapital til menning av øllum øðrum tættum í virking og sølu. Stuðulin, sum kann verða veittur sambært kapittul 2 í lógini, kann tí fáa sera stóra ávirkan á framtíðarmøguleikarnar.

Viðmerkingar til tær einstøku greinarnar:

Fyri fíggjarárið 1995 var løgtingslóg nr. 48 frá 2. mai 1995 um stuðul til menning av fiskivinnu á landi galdandi.

Tær týdningarmestu broytingar, sum bólkurin niðanfyri skjýtur upp, eru:

- at lógin ikki verður tíðaravmarkað,
- at kg-stuðul kann útgjaldast sambært skjalprógvum fyri innflutninginum,
- at ein endurnálsorðing verður gjørd viðvíkjandi kapittul 2 í lógini og m.a. sum ein avleiðing av hesum verður ásetingin í § 3, pkt. b) um talið á arbeiðsplássum strikað,
- at stuðul kann veitast til øll lið í virking, frá rávørutútvegan til sølu av lidnum vørum,
- at broyting verður gjørd í krøvunum í § 3, pkt. c) til fíggjarstøðuna hjá umsøkjaranum,
- at hámarkið fyri stuðli verður hækkað fyri ávís sløg av verkætlanum,
- at landsstýrið kann leggja umsiting av lógini til nevnd ella stovn.

Ad § 1, stk. 1 og § 2, stk. 1.
Higartil hevur lóg um menning av fiskivinnu á landi bert verið galdandi fyri eitt fíggjarár í senn, og løgtingið hevur samtykt nýggja lóg á hvørjum ári. Avleiðingin av hesum hevur verið, at studningsreglurnar ongantíð hava verið greiðar, fyrr enn árið var útvið hálvrunnið.

Arbeiðsbólkurin skjýtur upp, at sjálv lógin ikki verður tíðaravmarkað. Føroya Landsstýri eigur at taka stig til at broyta lógina, tá tørvur er á hesum, og at taka hana av, tá tíðin er komin til hetta. Fyri vinnuna hevur tað stóran týdning í góðari tíð at kenna reglurnar, sum skulu galda fyri framtíðina.

Hildið verður, at ein lóg uttan tíðaravmarking gevur meira støðug viðurskifti, uttan at landsmyndugleikarnir av hesum hava mist møguleikan fyri at gera broytingar í skipanini. Føroya Landsstýri skal á hvørjum ári taka støðu til, hvussu stór upphædd skal setast av á fíggjartøgini. Eru broytingar í studningsreglunum neyðugar, kann hetta gerast við at broyta kunngerðina innan karmarnar av lógini.

Ad § 1, stk. 1.
Ásett verður, at stuðulin er til **frystan** 3. lands fisk. Síðani stuðulin av fyrstan tíð varð latin, hevur endamálið verið at stuðla virking úr frystum fiski, tí hendu framleiðsla hevur serligar trupulleikar. Hetta verður nú skoytt uppí fyri at sleppa undan misskiljingum og gera tað greitt, at feskur fiskur ikki fær stuðul.

Ad § 1, stk. 2.
Arbeiðsbólkurin mælir til, at studningsupphæddin verður óbroytt 1,25 kr.pr./kg. Útrokningar vísa, at framleiðslan í stóran mun er treytað av hesi skipan. Vinnumboðini í bólkinum - sum hava royndir innan hesa framleiðslu - hava gjørt útrokningar, sum vísa, at studningurin svarar umleið til skiftisavlop 1. (árslit áðrenn fastar útreiðslur, rentur og avskrivingar). Tvs. at um eingin studningur var, hevði skiftisavlop 1 verið 0 kr, og harvið hevði eingin framleiðsla verið úr 3. landsfiski.

Tað eru fleiri orsøkir til, at ikki verður mælt til, at stuðulin skal minkast enn. Virkini hava lagt framleiðsluna um frá at byrja við einans at virka blokk, til nú at fáa meiri tilvirkaðar vørur (portiónir) burturúr rávøruni. Henda umlegging hevur havt við sær meirútreiðslur og harafturat skulu nýggir marknaðir eisini finnast. Eisini eru broytingar í rávøruprísinum og negativ útlit fyri sølu í ár v.m., orsøk til at stuðulin ynskist óbroyttur.

Ad § 1, stk. 3.
Higartil hevur studningurin verið útgoldin sambært skjalprógvum fyri innflutningi og útflutningi. Tað hevur havt við sær, at virkini ikki hava fingið stuðulin útgoldnan, fyrr enn vøran er seld. Hetta kann taka drúgva tíð, og tað ávirkar likviditetin hjá virkjunum.

Í notati frá Menningarstovuni dagfest 15. desembar 1995 um útgjald av kg-stuðli er niðurstøðan tann, at landsstýrið undir ávísum treytum kann útgjalda studningin sambært skjalprógvum fyri innflutningi.

Um so er, at virkini selja óvirkaðan fisk, eigur studningur at verða goldin landsstýrinum aftur beinanvegin. Føroya Landsstýri eigur at fáa váttan um, hvørt virkið hevur sett óvirkaðan fisk, og í tí føri, hvussu mógv.

Arbeiðsbólkurin heldur ikki, at vandi er fyri, at eitt virki fer at selja fiskin bert lítið virkaðan. Útrokningar frá virkjunum vísa, at tað lønar seg ikki hjá virkjunum, fyrst at upptíðna fiskin, og síðani útflyta hann bert lítið viðgjørdan. Tá fiskurin er tíðrættur, skal ein munandi virking til, um virkið ikki skal hava hall av framleiðsluni.

Umsøkjarin skal sambært § 1, stk. 2 geva gjølligar upplýsingar um rávørukeypið og ætlaða framleiðsluna, og tí eigur Føroya Landsstýri heldur, tá árið er liðið, at krevja rokniskapartal fyri nádd árslit, sum treyt fyri framhaldandi at veita stuðul. Við hesum fær landsstýrið møguleika fyri at meta um, hvørt endamálið við

stuðlinum verður nátt, um stuðulin eigur at halda fram, hvussu stór stuðulsupphæddin eigur at verða, o.s.fr. Krøvini frá landsstýrinum til virkini eiga at vera:

- at virkini gera serskilan roknskap fyri 3. landsfiskin.
- at grannskoðaraváttað uppgerð verður latin landsstýrinum hálvárliga ella árliga, sum vísir keypta nøgd, virkaða nøgd og hvussu stórur partur er seldur víðari ótilvirkaður.

Hesi krøvini kann landsstýrið seta í kunngerðini um stuðul til menning av fiskivinnu á landi, víst verður til heimildina í § 5 í lógini.

Ad § 2, stk. 2.

Arbeiðsbólkurin heldur, at ein greið endamálsorðing hevur manglað fyri kapitul 2 í lógini. Við tí endamálsorðing, ið er skotin upp, verður dentur lagdur á menning av fiskavirkjunum í øllum liðum í virkingini. Henda menning tekur tíð, og kanska serliga tí at grundleggjandi viðureskifti innan framleiðslu og sølu skulu broytast. Tað er framleiðslan av hávirðisvørum, sum gevur besta úrslitið, bæði tí tað snýr seg um samfelagsligt ískast og lønsemi hjá virkjunum.

Við á henda hátt at menna lønandi og rasjonella framleiðslu verður tørvurin á arbeiðsmegi tryggjaður í framtíðini. Hin parturin av endamálsorðingini, nevniliga "at virka fyri øktari framleiðslu" hevur til endamáls at skapa fleiri arbeiðspláss, bæði nú og í framtíðini.

Ad § 2, stk. 3.

Í ásetingini um hvørjar verkætlanir kunnu stuðlast, hevur arbeiðsbólkurin skoytt uppí "menning av rávørumótvegan". Hetta er gjørt tí, at í einstøkum verkætlanum liggja trupulleikarnir í hesum liðnum. Arbeiðsbólkurin leggur dent á, at júst heildin í verkætlanum eigur at verða í lagi, um tað skal hava meining at seta hesar í verk og at stuðla teimum frá almennari síðu.

Ad § 3, pkt. b).

Arbeiðsbólkurin heldur, at orðingin í § 3, pkt.b) "uttan at skerja verandi arbeiðspláss" eigur at verða strikað. Grundgevingin fyri hesum er tann sama, sum er nevnd í viðmerkingunum til § 2, stk. 2. Verandi orðing kann beinleiðis forða fyri, at samfelagsligar lønandi verkætlanir verða settar í verk, um so er, at verkætlanin í løtuni hevur eina tíðla minkitig av arbeiðsplássum við sær, sjálvt um verkætlanin tryggjar og økir um arbeiðsplássini sum frá líður.

Ad § 3, pkt. a) og c).

Tá lóg um stuðul til menning av fiskivinnu á landi varð samtykt fyri 1995, hevði løgtingið skoytt uppí nýtt punkt (§ 3, pkt. c), har kravt verður, at umsøkjarin skal leggja fram váttan fyri tryggu fíggjarstøðu sínu. Hetta førdi til, at Føroya Landsstýri í kunngerðini setti krav um, at umsøkjarin skuldi leggja fram dagførda váttan frá grannskoðara uttan fyrivarni um at umsøkjarin lýkur treytirnar í roknskaparlógini um "going concern".

Soleiðis sum § 3, pkt. c) í lógini er orðað, ber illa til at umsita hesa áseting linari enn landsstýrið hevur gjørt. Hesa niðurstøðu hevur arbeiðsbólkurin gjørt aftaná at hava tosað við grannskoðarar um spurningin. Bólkurin hevur eisini fingið áheending um, at tað bert eru heilt fá fiskavirkir í landinum, sum kunnu fáa tílíka váttan frá grannskoðara, og at talið av umsóknum tí ikki verður stórt.

Arbeiðsbólkurin er samdur í, at tað skal tryggjast, so væl sum til ber, at játtaður stuðningur ger nytta svarandi til endamálið við stuðninginum. Hinvegin skerst ikki burtur, at ein av høvuðsorsøkunum til, at stuðningur er neyðugur, er, at búskaparliga støðan hjá fiskavirkjunum yvirhøvur er sera veik.

Arbeiðsbólkurin heldur tað ikki vera rett at seta so avgjørdar treytir fyri stuðninginum, at bert nøkur heilt fá fiskavirkir kunnu fáa stuðul játtaðan. Við bert at stuðla teimum fáu virkjunum missir stuðulsskipanin sín týdning sum amboð til at fremja broytingar í framleiðslumynstrinum.

Arbeiðsbólkurin hevur tí skotið upp at broyta krøvini um trygga fíggjarstøðu til "at umsøkjarin leggur fram neyvar upplýsingar um fíggjarstøðu sína". Í staðin heldur arbeiðsbólkurin, at størri krøv eiga at verða sett til sjálva verkætlanina. Hetta kann verða gjørt við at landsstýrið í kunngerðini krevur at løggildur ella skrásettur grannskoðari hevur áteknað kostnaðar- og rakstrarætlanina, sum verður kravd sambæri § 3. pkt. a).

Føroya landsstýri eigur eisini í kunngerðini at krevja, at upplýsingarnir um fíggjarstøðuna (§ 3. pkt.c) verða áteknaðir av løggildum ella skrásettum grannskoðara.

Ad § 4.

Arbeiðsbólkurin skjýtur upp, at hámarkið fyri stuðli verður økt úr 33,3% upp til 50% tá tað snýr seg um stuðul til t.d. vørumenning, marknaðarføring o.t. Tá talan er um vanligar fløgur í amboð, heldur bólkurin ikki grund verða fyri, at studningurin skal hækkast. Grundgevingarnar fyri uppskotnu broytingini eru:

- Tað er torførari hjá virkjunum at útvega neyðuga fígging til vørumenning, marknaðarkanningar, søludeming o.t. enn til fløgur í maskinur og onnur amboð. Tá talan er um maskinur o.a., kann fíggingarstovnur tryggja seg við at krevja pant í útgerðini. Hetta er ikki møguligt, tá talan er um menningarátreiðslur, har úrslitið ofta er vitan.

- Arbeiðsbólkurin heldur, at størri dentur eigur at verða lagdur á at stuðla menningarætlanum, sum vørumenning og søludeming. Tann fíggjarliga støðan hjá fiskavirkjunum ger, at virkini illa eru før fyri at seta størri verkætlanir av hesum slagi í verk.

- Grunnurin til ídnaðarfrembjandi endamál kann stuðla vørumenning, søluroyndum, søludrembjandi tiltøkum og marknaðarkanningum, og vanligi stuðulin er 50% av skjalprógvaðum útreiðslum. Neyvan er grund til at hava líknandi stuðulsskipanir í lóg um menning av fiskivinnu á landi, har stuðulin er munandi minni, tí so fær grunnurin til ídnaðarfrembjandi endamál umsóknirnar.

Hetta kundi tala fyri, at stuðulsskipanir, sum líkjast, áttu at verið sammansjóðaðar til eina stuðulsskipan. Hetta krevur tó, at skipanirnar verða viðgjørdar undir einum. Arbeiðsbólkurin heldur, at lóg um menning av fiskivinnu á landi gevur møguleika fyri at stuðla heildarætlanum, og at torvurin á hesum er somikið stórur, at avmarkingar ikki eiga at verða gjørdar í lógini, sum er. Tað er ein fyrimunur, at stuðul til eina verkætlan kann viðgerast undir einum.

1. viðgerð 9. apríl 1996. Málið verð beint í vinnunevndina, sum 9. mai 1996 legði fram soljóðandi

Átit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 25. mars 1996 og eftir 1. viðgerð 9. apríl 1996 beint í vinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við landsstýrismannin í fiskivinnumálum og umboð fyri fiskivinnuumsitingina.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meirilluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Henrik Old, Jákup Joensen, Óli Jacobsen, Ávur Zachariasen og Lasse Klein) tekur undir við málinum, men mælir til at gera nakrar broytingar í uppskotinum.

Meirilutin mælir til, at orðingin "3. landsfiskur" verður strikað. Hetta vil strika hesa avmarking í lógini, og síðan kann landsstýrið í kunngerð áseta avmarkingar, sum tó vil gera tað møguligt, at geva farna-

gjaldsstuðning til innkeyp av fiski úr EU londum.
Eisini mælir meirilutin til, at stuðul kann latast til innflutan feskan fisk, men hesin stuðul kann tó í mesta lagi verða kr. 1,00 fyri kg.

Meirilutin mælir til at stuðulin kann útgjaldast sambæt skjalprógvum fyri inn- og útflutningi.

Meirilutin mælir eisini til, at lata ein eyka stuðul til virki, sum av nýggjum fara undir framleiðslu av innfluttum fiski á plássum, har slík framleiðsla ikki er frammanundan. Hesin stuðul kann vera upp til 50 øyru/kg og skal avmarkast til at vara í eitt ár frá tí, framleiðslan byrjar.

Í viðmerkingum til uppskotið sigur landsstýrið, at landsstýrið kann leggja umsitingina av lógini til nevnd ella stovn. Meirilutin tekur ikki undir við hesum brotinum í viðmerkingunum.

Meirilutin mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins við nevndu broytingum og setir tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

1) Í yvirskriftini til kapittul 1 verða orðini "3. lands" strikað.

2) Í § 1, stk. 1, verða orðini "frystum 3. lands" strikað.

3) Í § 1, stk. 2, verður aftaná orðini "hvørt kg av" sett "frystum" og aftaná annað punktum verður skoytt uppí: "Fyri feskan fisk kann stuðulin tó í mesta lagi vera kr. 1,00."

4) § 1, stk. 3 verður soljóðandi: "Stk. 3. Stuðulin kann útgjaldast sambæt skjalprógvum fyri inn- og útflutningi."

5) Sum nýggj § 2, stk. 4 verður sett:
"Umframt tann stuðul, sum er ásettur í § 1, stk. 2, hevur landsstýrið heimild til at lata ein eyka stuðul til virki, sum av nýggjum fara undir framleiðslu av innfluttum fiski á plássum, har slík framleiðsla ikki er frammanundan. Hesin stuðul kann vera upp til 50 øyru/kg og skal avmarkast til at vara í eitt ár frá tí, framleiðslan byrjar".

Minnilutin (Anfinn Kallsberg) hevur hesar viðmerkingar: Fyriliggjandi uppskot er enn eitt prógv um, at tað sum Fólkaflokkurin í fleiri ár hevur vístá við manglandi lønsemi, bæði í vinnuni og hjá tí einstaka, var rætt.

Vit hava vístá, at tað er neyðugt at lækka skatta- og avgjaldstrýstið, fyri at geva pláss fyri at lækka kostnaðarstøðið í samfelagnum. Hetta er einasti møguleiki fyri at fáa vinnuna kappingarføra, og harvið rúm fyri at skapa arbeiðspláss, sum liggja á einum sunnum grundarlagi.

Sitandi samgonga, saman við tjóðveldisflokkinum, hevur niðurgjørt okkara uppskot, og hevur í staðin gjørt lóggávu sum hesa, sum byggir á, at summir partar í vinnuni skulu fáa stuðul úr landskassanum við leirri grundgeving, at um hesin stuðul ikki verður latin, so verður hesin partur av vinnuni ikki lív lagað. Hetta er so ein ásannan av, at Fólkaflokkurin hevði rætt, nevniliga at vinnan ikki er kappingarfør.

Úrslitið er, at ein stórur partur av vinnuni aftur fær stuðul av einum hvørjum slag.

Fyriliggjandi uppskot skal lata upp til 1,25 kr. pr. kg. í studningi til framleiðslu úr 3. lands frystum fiski. Áttlanin er hjá meirilutanum at víðka hetta til eisini at galda fyri feskan fisk, sum verður keyptur frá útlend-

ingum. Trupulleikin er, at frystur og feskur fiskur, fiskaður av føroyskum skipum, fær ikki henda stuðul. Tí kann tað tykjast løgið, at løgtingið við skattaborgaranum peningi játtar stuðul til innkeyp av útlendskum fiski, meðan føroyskur fiskur, orsakað av vánaligum prísi í Føroyum, fer óvirkaður av landinum.

Høvdu vit í staðin havt gjøgnumført uppskot fólkafloksins, so høvdu vit ikki hesa kappingaravlagaðu lóggávuna fyri neyðini, nei, vit høvdu kunnu uppbygt eitt sunt og sterkt vinnulív, sum ikki hevur almennar studningskrónur úr landskassanum fyri neyðini.

Vit í fólkaflokkinum mugu tíverri staðfesta, at eingin politiskur vilji er á Føroya løgtingi at loysa vinnulívstrupulleikarnar sum eina heild. Tí fara vit at atkvøða fyri tí fraegasta í fyriliggjandi uppskoti og broytingaruppskoti út frá teimum sjónarmiðum, at eingin vilji er í tinginum at fremja heildarloysnir, men fyriliggjandi uppskot er bert lappari upp á lappaloysnir.

Minnilutin (Heini O. Heinesen) tekur støði í tingsalinum.

2. viðgerð 13. mai 1996. Broytingaruppskot meirilutans samtykt við 21-5-4 atkvøðum. Samtykt við 23-4-4 atkvøðum at beina málið soleiðis broytt til 3. viðgerð.

14. mai 1995 varð leyvi tingsins fingið at víkja frá tíðarfreistini millum 2. og 3. viðgerð. Samtykt við 29-0-0 atkvøðum.

3. viðgerð 15. mai 1996. Málið endaliga samtykt við 20-3-5 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 84, 28. mai 1996.

F.L. j.nr. 1525-11/94.

85 Løgtingslóg um Arbeiðsumhvørvi

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Axel Nolsøe, landsstýrismaður fram soljóðandi

Uppskot

til

LØGTINGSLÓG UM ARBEIÐSUMHVØRVI.

KAPITTUL I

Endamál og øki

§ 1. Endamálið við lógini er at:

1) virka fyri einum tryggum og heilsugóðum arbeiðsumhvørvi, sum altíð er í samljóð við teknisku og socialu gongdina í føroyska samfelagnum, og
2) skapa grundarlag fyri, at virkini sjálvi kunnu loysa teirra trygdar- og heilsuspurningar, við vegleiðing og í samstarvi við feløgini á arbeiðsmarknaðinum, og við vegleiðing og eftirliti av Arbeiðseftirlitinum.

§ 2. Henda lóg fevnir um arbeiði í Føroyum fyri arbeiðsgevara.

2. stk. Undantikið eru:

1) arbeiði í privata húsahaldi arbeiðsgevarans,
2) arbeiði, sum einans verður avrikað av limum í húsi arbeiðsgevarans, og sum hoyra til húskið, sumanber tó § 49, 1. stk., 2. pkt.
3) veiða og fiskiskapur.

3. stk. Niðanfyri nevndu reglur fevna eisini um arbeiði, sum ikki verður gjørt fyri ein arbeiðsgevara, og tey arbeiði, sum nevnd eru í 2. stk. nr. 1-3.

1) § 16 um fleiri arbeiðsgevarar v.m., sum eru á sama arbeiðsplássi, §§ 26-32 um úlvegafyrirtøkur o.a. og um arbeiðstakarar o.a. og § 33 um byggilutrar v.m.,
2) §§ 34-36 um útlinnan av arbeiði,

3) §§ 39-40 um tekniskt hjálpartól,
4) §§ 41-42 um evni og tilfar,
5) § 49, 2. stk. um ov ungan aldur, tá tað snýr seg um vandamikið arbeiði.

§ 3. Lógin hevur bert gildi fyri loftferðsluna, tá talan er um arbeiði á landi.

2. stk. Lógin hevur bert gildi fyri sjóvinnu og fiskivinnu í niðanfyri nevnda førum:
1) Ferming og lossing av skipum, eisini fiskiskipum.
2) Arbeiði hjá fyritøkum umborð á skipum, eisini fiskiskipum.

KAPITTUL 2
Trygdar- og heilsulig tiltøk á virkjum

A. Persónligt samband

§ 4. Á virkjum, har 1-9 fólk eru í arbeiði, eigur arbeiði hjá virkinum, viðvíkjandi trygd og heilsu, at fara fram soleiðis, at mest møguligt persónligt samband er millum arbeiðsgevaran og møguligar arbeiðsleiðarar, smbr. § 20, og hini arbeiðsfólkini. Føroya Landsstýri kann tó gera reglur um bygnaðin av einari trygdarskipan, har hetta verður hildið at vera neyðugt.

B. Trygdarskipanin

§ 5. Á virkjum, har 10 ella fleiri fólk arbeiða, skal arbeiði hjá virkinum, viðvíkjandi trygd og heilsu samskipast.

2. stk. Arbeiðsleiðarin fyri einum virkisøki skal saman við einum trygdarumboði skipa ein trygdarbólk fyri tað ávísa arbeiðsøki.

3. stk. Har eitt álitisfólk er valt, kann hesin samstundis verða trygdarumboð. Eru fleiri álitisfólk innan sama øki, kunna hesi sínámillum velja eitt trygdarumboð. Í øðrum førum velja starvsfólkini eitt trygdarumboð fyri hvørt arbeiðsteiðaraøki, til at virka í trygdarbólkinum. Trygdarumboðið umboðar arbeiðsfólkið í spurningum, sum viðvíkja trygdar- og heilsuviðurskiftum teirra.

4. stk. Tey arbeiðsleiðaraøki, sum hava bert fá arbeiðsfólk, ella hava bert fá arbeiðsumhvørvislig vandamál, kunnu frá Arbeiðseftlitinum fáa undantak frá kraviunum um serligar trygdarbólkar.

§ 6. Á virkjum, sum hava 20 arbeiðarar ella fleiri, skal trygdarnevnd skipast. Á virkjum, har ein ella tveir trygdarbólkar eru, skulu limirnir í hesum bólki ella bólkum, saman við arbeiðsgevaranum ella einum umboði fyri hendan, ið hevur ábyrgdina av virkinum, skipa trygdarnevndina, soleiðis at nevndin á virkjum við einum trygdarbólki fær 3 limir, og á virkjum við tveimum bólkum fáa 5 limir.

Á virkjum, har fleiri enn tveir trygdarbólkar eru, velja trygdarumboðini sínámillum 2 limir og arbeiðsleiðarnir sínámillum 2 limir. Hesir 4 limirnir skulu so saman við arbeiðsgevaranum ella einum umboði fyri hendan, ið hevur ábyrgdina av virkinum, skipa trygdarnevndina, sum soleiðis fær 5 limir.

Trygdarnevndin skal fyriskipa, leiða, ráðgeva, kunna og hava eftirlit við tí trygdar- og heilsuligu arbeiðinum á virkinum.

2. Stk. Eftirlitsmaðurin hjá Arbeiðseftirlitinum skal, tá hann vitjar virkið, hava samband við leiðsluna á virkinum, trygdarumboðini á staðnum, trygdarbólkarnar og umboð fyri trygdarnevndina. Tey ymsu trygdarumboðini skulu hava loyvi til at leggja fyri eftirlitsmannin hjá Arbeiðseftirlitinum allar teir spurningar, sum havu týðuing fyri trygdina og heilsuumstøðurnar á virkinum.

§ 7. Føroya Landsstýri kann áseta nærri reglur um bygnaðin og virksemi hjá virkinum, viðvíkjandi arbeiði innan trygd og fyribyrging av heilsuvandum, t.d. reglur um:
1) val av trygdarumboðum,
2) rættindir og skyldur hjá trygdarumboðunum,
3) stovnan av trygdarbólkum og trygdarnevndum, og arbeiðsøkjum teirra,
4) útbúgving hjá limunum í trygdarskipanini,
5) ta dagligu leiðsluna av trygdararbeiðinum.

2. stk. Fyri tey arbeiði, arbeiðsøki ella arbeiðsplass, har tað verður hildið at vera óneyðugt at hava trygdararbeiði, sambært hesa lóg, er heimilað Landsstýrinum at gera frávík frá reglunum í hesi lóg, ella at laga tær eftir teimum serligu viðurskiftunum.

§ 8. Arbeiðsgevarin skal síggja til, at sett verður av, ein eftir viðurskiftunum, rímilig tíð til limirnar í trygdarbólkinum og trygdarnevndunum til at røkja skyldur sínar í trygdararbeiðnum.

2. stk. Arbeiðsgevarin skal syrgja fyri, at limirnir í trygdarbólkunum og trygdarnevndunum fáa høvi til at fáa neyðuga vitan og útbúgving í trygdarspurningum.

3. stk. Arbeiðsgevarin skal geva trygdarbólkunum/-trygdarnevndunum høvi til at luttaka í teimum

ráðleggingum, sum viðvíkja trygdini/heilsuumstøðunum á arbeiðsplássinum.

4. stk. Á virkjum, bar tað sambært § 5, eru ein ella fleiri trygdarbólkar, men ongar trygdarnevndir, sambært § 6, skal arbeiðsgevarin síggja til, at tey verkevni, sum viðvíkja trygdarnevndini verða viel og virðiliga røkt í samarbeiði við trygdarbólkin/bólkurnar.

§ 9. Arbeiðsgevarin ber útreiðslurnar, ið standast av virksemi trygdarumboðsins, og rindar hesum fyri miss av inntøku, eisini tá tað snýr seg um inntøkumiss í samband við neyðuga luttøku á trygdarskeiðum o.a. Sama er galdandi fyri arbeiðsleiðarin, tá hesin luttekur á fyriskipaðum trygdarskeiðum v.m.

2. stk. Føroya Landsstýri kann áseta nærri reglur um, at landskassin letur tilskot til alla og/ella partvísa gjalding av teimum útreiðslum, ið stava frá úrbúgving av limum í trygdarskipanini.

3. stk. Limirnir í trygdarskipanini eru vardir móti uppsøgn og aðrari skerjan av viðurskiftum teirra, á sama hátt sum álitisumboð og talsmenn teirra eru tað innan teirra fakliga arbeiðsøki.

Eisini skal arbeiðsgevarin minst eina viku, áðrenn limur í trygdarskipanini verður uppsagdur, kunna Arbeiðseftirlitið, soleiðis at Arbeiðseftirlitið hevur møguleika at kanna viðurskiftini í samband við uppsøgnina.

4. stk. Verður ósemja um tey í 1. og 3. stk. nevndu viðurskifti, t.d. spurningin um hvørjar reglur skulu nýtast, ella um brot á og tulking av reglunum, so skulu hesar avgerast á lakligan hátt ella, um hetta letur seg ikki gera, av rettinum.

§ 10. Føroya Landsstýri kann áseta nærri reglur um, at virkir skulu síggja til at latin verður sakkøn hjálp, sum í samband við trygdararbeiði, skal ganga til handa, tá viðurskiftini fyri trygdini ella heilsuni hjá starvsfólkunum tala fyri hesum.

KAPITTUL 3

Vanligar reglur

A. Arbeiðsgevarin

§ 11. Arbeiðsgevarin skal síggja til, at arbeiðsviðurskiftini, viðvíkjandi trygd og heilsu, eru góð. Í hesum sambandi verður serliga víst til:

1) Kapittul 4, um útinnan av arbeiðinum.
2) Kapittul 5, um arbeiðsplássið.
3) Kapittul 6, um teknisk hjálpartól.
4) Kapittul 7, um evnir og tilfar.

§ 12. Á virkjum og arbeiðsplássum, sum eru undir hesi lóg, skulu eftir Arbeiðseftirlitsins ætlan verða tørvandi ráð til handa til fyrstuhjálp í vanlukkutilburði, eins og eftirlitið kann treyta tilgerð av serstakari skaðastovu á størri virkjum, um mett verður, at tørvur er á hesum.

2. stk. Á arbeiðsplássum har fleiri enn 20 fólk starvast, kann Arbeiðseftirlitið krevja, at góðkendar burur eru til taks og at minst eitt fólk hevur tikið eitt av Arbeiðseftirlitinum góðkent skeið í fyrstuhjálp.

§ 13. Arbeiðsgevarin skal við leiðbeining og gjølla eftirliti vissa seg um, at arbeiðið við atliti til skaða- og heilsuvanda verður gjørt fult forsvarliga.

§ 14. Arbeiðsgevarin skal kunna arbeiðsfólki um teir vanlukku- og heilsuvandar, sum møguliga eru tengdir at arbeiði teirra.

2. stk. Arbeiðsgevarin skal eisini síggja til, at arbeiðsfólki fær neyðuga upplæring og leiðbeining í at gera arbeiði so vandaleyst, sum yvirhøvur gjørligt.

3. stk. Føroya Landsstýri kann áseta nærri reglur um skyldur arbeiðsgevarans, sambært 1. og 2. stk.

§ 15. Arbeiðsgevarin skal síggja til, at samstarv um trygd og heilsu verður fremt, sambært ásetingum í 2. kapitli, og skal hann eisini luttaka í samstarvinum.

§ 16. Hava fleiri arbeiðsgevarar arbeiði um hendi, og fer hetta fram á sama arbeiðsplássi, skulu øll, sum starvast á slíkum arbeiðsplássi, samstarva um at skapa trygg og heilsugóð arbeiðsviðurskiftir fyri øll, ið starvast her.
2. stk. Føroya Landsstýri kann áseta nærri reglur um frammanfyri nevnda samstarv.

§ 17. Arbeiðsgevarin hevur skyldu til at kunna trygdarumboðini og álitisfólkini, innan viðkomandi arbeiðsøki, um tey boð, sum Arbeiðseftirlitið, ella

tann í § 57 nevndi myndugleiki ella stovnur, skrivliga bevur fyrisett. Somu skyldu hevur arbeiðsgevarin fyri hinum trygdarumboðum ella álitis-fólkum, sum ynskja at fáa kunnleika til tey givnu boðini.

2. stk. Eru hvørki trygdarumboð ella álitisfólk á einum arbeiðsplássi, skulu tey, sum arbeiða á nevndu virkjum, vera kunnað um tey boð, sum umrødd eru í 1. stk., 1. pkt.

§ 18. Tá Arbeiðseftirlitið krevur tað, ella um viðurskiftini annars tala fyri tí, skal arbeiðsgevarin seta í verk kanningar, royndir og ástaðareftirlit, og møguliga boðsenda sakkønari hjálp, fyri at tryggja sær, at arbeiðsviðurskiftini, viðvíkjandi trygd og heilsu eru fullgóð.

2. stk. Arbeiðseftirlitið kann til hagfrøðisliga nýtslu, krevja upplýsingar frá arbeiðsgevara um viðurskiftir, sum hava arbeiðsumhvørvisligan týdning.

Í teimum førum, har hesi hagtøl verða almannakunngjørd, mugu nøvn ella fyritøkur ikki nevnast.

§ 19. Ásetingarnar í hesi lóg um arbeiðsgevarans skyldur eru eisini galdandi fyri tann, sum leiðir ella luttekur í leiðslu virkisins.

B. Arbeiðsleiðarin

§ 20. Við arbeiðsleiðara er at skilja hann/hon, hvørs arbeiði bert ella fyri størstan partin er, arbeiðsgevarans vegna, at leiða og hava eftirlit við arbeiðnum á virkinum, ella pørtum av hesum.

§ 21. Arbeiðsleiðarin skal virka fyri, at arbeiðsviðurskiftini á hansara øki eru fult forsvarlig, viðvíkjandi trygd og heilsu. Arbeiðsleiðarin skal eisini síggja til, at tey tiltøk, sum gjørd vera við tí fyri eyga, at betra um trygdar- og heilsuviðurskiftini á arbeiðsplássinum, virka eftir ætlan.

2. stk. Verður ein arbeiðsleiðari varugur við trot ella brek, sum kunna føra til vanlukkutilburðir ella sjúku hjá arbeiðsfólkunum, skal hann beinanvegin síggja til, at neyðug tiltøk verða framd fyri at forða fyri, at vanlukka ella sjúka stendst av hesum.

Er hann ikki førur fyri beinanvegin at seta hesi tiltøk í verk, skal hann beinanvegin siga arbeiðs-gevaranum frá hesum vandamáli.

§ 22. Arbeiðsleiðarin skal luttaka í samstarvinum um trygd og heilsu, sum ásett í kapitul 2, §§ 16 og 33.

C. Starvsfólk

§ 23. Arbeiðsfólki skal virka fyri, at arbeiðsviðurskiftini, viðvíkjandi trygd og heilsu eru fult forsvarligt innan teirra arbeiðsøki, íroknað tey tiltøk, sum verða gjørd fyri at fremja trygdina og heilsuna, virka sum ætlað.

2. stk. Verður arbeiðsfólk varug við brek ella trot, sum kann vera til vanda fyri trygdina ella heilsuna, og sum tey sjálvi eru ikki før fyri at bøta um, skulu tey beinanvegin boða trygdarbólk-inum, arbeiðsleiðaranum ella arbeiðsgevaranum frá.

3. stk. Har, tað vegna útinnan av einum arbeiði, eitt nú umvæling ella umsiting, fyribils er neyðugt at taka burtur trygdartiltøk, skal ansast eftir, at hetta ella hesi tiltøk verða sett aftur uppá pláss, beinanvegin umrødda arbeiðið er liðugt, ella at eins góð verndartiltøk verða gjørd.

§ 24. Arbeiðsfólkini skulu luttaka í samstarvi um trygd og heilsu, sum hetta er ásett í kapitul 2.

§ 25. Tey, sum hava starv sítt á einum arbeiðsplássi, har fleiri arbeiðsgevarar hava tey ymisku arbeiðini um hendi, skulu geva seg undir tær reglur, sum eru galdandi fyri samstarv hjá virkjunum, samanber §§ 16 og 33, umframt tær reglur, ið fevna um tað arbeiði, tey skulu útinna.

2. stk. Tey, sum arbeiða á økinum hjá einum fremmandum virki, skulu geva seg undir tær reglur um trygd og heilsu, sum galdandi eru fyri nevnda virki, umframt tær reglur, ið fevna um tað arbeiði, tey skulu útinna.

D. Útvegamenn, innleggjarar, umvælarar, ráðleggjarar o.a.

§ 26. Tann sum selur, útleigar, gevur ella sýnir fram maskinur, maskinlutir, íløt, lutvíst tilvirkaðar konstruktiónir, tól, amboð ella onnur teknisk hjálpartól, skal síggja til, at nevndu lutir, tá teir verða útflýggjaðir til nýtslu ella verða vístir fram, verða útgjørdir við neyðugum trygdarútbúnaði, og kunnu nýtast til tað, teir eru ætlaðir, uttan at vera vandamiklir fyri trygdina ella heilsuna, sambært kapitul 6. Neyðugar og lætt skiljandi leiðbeiningar um nýtslu, umsiting, flutning, og uppseting skulu fylgja við, tá lutirnir verða útflýggjaðir.

2. stk. Verða liðug teknisk hjálpartól útflýggjað, latin til sølu, útleigað ella útlánt, galda somu

skyldur, sum ofanfyri eru hevndar.
3.stk. Tá Arbeiðseftirlitið krevur tað, ella viðurskiftini gera tað neyðugt, skal innflytarin ella framleiðarin síggja til, at kanningar, royndir og sýningar verða gjørdar av sakkønum persóni, fyri at staðfesta, at tað tekniska hjálpartólið er fult forsvarligt, viðvíkjandi trygd og heilsu.

4. stk. Tá Arbeiðseftirlitið krevur tað, skal innflytarin ella framleiðarin upplýsa, um tær seldu nøgdirnar av einum tekniskum hjálpartóli kunnu hava við sær vandar fyri trygd og heilsu.

§ 27. Allar maskinur, sum verða útflýggjaðar ella sýndar fram í Føroyum, skulu vera merktar við navninum á framleiðaranum. Verða maskinurnar innfluttar, skal navn og bústaður innflytarans ella annað frámerki standa á maskinunum, soleiðis at eingin ivi er um, hvør er framleiðari ella innflytari.

§ 28. Tann, sum í sjálvstøðugari vinnu innleggur, umbyggir ella umvælir eitt tekniskt hjálpartól, skal ansa eftir, at trygdartreytirnar og trygdarávísingarnar, sum eru galdandi fyri hjálpartólið, eru fylgdar.

2. stk. Um ein umvælling bert fevnir um ein ella nakrar partar av tí tóli, sum verður umvælt, skal umvælarin ansa eftir, at trygdartreytirnar og trygdarávísingarnir fyri hendan part/partar verða fylgdar. Verður umvælarin í hesum arbeiði varugur við, aðrar feilir og trot, sum hava trygdarligan týðning, skal hann gera eigaran, ella brúkaran kunnugan við hetta.

§ 29. Tann, sum letur frá sær eina verkætlan um eitt tekniskt hjálpartól, framleiðsluútbúnað, byggi- ella útbúnaðararbeiði, skal í ætlanum sínum taka fyrilit viðvíkjandi trygd og heilsu, tá arbeiðið verður gjørt, og viðvíkjandi rakstrinum av lidna bygninginum ella útbúnaðinum. Hetta hevur eisini gildi fyri tann ella teir, ið hava eftirlit við eini slíkari verkætlan, ella sum ráðgeva um viðurskiftir innan arbeiðsumhvørvi.

§ 30. Reglurnar í §§ 26, 27, 29 og 31, 2. stk. hava eisini gildi fyri útvegamenn o.a., av evnum og tilfari við eginleikum, ið kunnu vera vandamikil fyri trygdina og heilsuna.

§ 31. Føroya Landsstýri kann áseta nærri reglur um tey í §§ 26-30 umrøddu viðurskiftir.Reglurnar í §§ 26-30 frítaka ikki brúkarin fyri skyldur eftir lógini.

§ 32. Eru serlig viðurskifti, kann Føroya Landsstýri áseta reglur ella fremja avgerðir, sum víkja frá krøvunum í grein 26-30. Slíkar avgerðir kunnu eisini í ávísum førum, um serlig viðurskiftir tala fyri tí, takast av Arbeiðseftirlitinum.

E. Byggiharrar

§ 33. Í byggi- ella øðrum útbúnaðarvirksemi, har meira enn 10 persónar starvast, ið byggiharrin setur til tess, samskipa tey tiltøk, ið kunnu fremja trygdina og heilsuviður-skiftini hjá teimum, ið starvast á byggiplássinum hjá teimum ynsu arbeiðsgevarunum.

2. stk. Føroya Landsstýri kann áseta nærri reglur hesum viðvíkjandi.

KAPITTUL 4

Útinnan av arbeiðnum

§ 34. Arbeiðið skal skipast, leggjast til rettis og gerast soleiðis, at tað við atliti til trygd og heilsu er fult forsvarligt.

2. stk. Galdandi reglur og fyriskipanir, sum hava trygdar- ella heilsuligan týðning, skulu fylgjast, hevur ikki Føroya Landssstýri avgjørt annað.

§ 35. Føroya Landsstýri kann áseta nærri reglur um tey krøv, sum skulu vera lokin, fyri at eitt arbeiði kann metast fult út ráðiligt, tilætlað, skipað og gjørt, herundir um:

1) tiltøk, ella møguligt bann, móti serliga vandamiklum arbeiði, arbeiðsgerðir og arbeiðshættir.
2) persónligar verndarlutir og serlig arbeiðsklæðir,
3) at tey arbeiði, sum hava við sær stóran vanda fyri vanlukkum ella sjúkum, herundir spreingiarbeiði v.m., bert mugu gerast av persónum, sum hava prógv fyri, at teir hava eina nærri ásetta úthúgving, ella hava staðið royndi.
4) at har, sum umstøðurnar vegna trygd og heilsu krevja tað, skulu skipanir fyri arbeiðsgongdina, arbeiðsætlanir, og arbeiðshættir gerast, og at slíkar skipanir og broytingar av hesum, skulu leggjast fyri Arbeiðseftirlitið til ummælis ella góðkenningar, áðrenn tær verða settar í verk.

2. stk. Í nevndu reglum kunnu nýtast úvísingar til reglur og fyrisett mát, tá hesi eru týðiliga ásett, herundir eisini dagfesting.

§ 36. Landsstýrið kann áseta, at tær teknisku fyriskipanir, sum lýstar eru við heimild í dansku ar

beiðsumhvørvislógini, heilt ella fyri ein part skulu galda her á landi. Hesar serskipanir og tekn-isku fyriskipanir verða ikki kunngjørdar.

KAPITTUL 5

Arbeiðsplássið

§ 37. Arbeiðsplássið skal vera soleiðis innrettað, at tað lýkur øll trygdar- og heilsulig krøv.

2. stk. Galdandi reglur og fyrisett mát, ið hava trygdar- ella heilsuligan týdning, skulu fylgjast, hevur ikki Føroya Landsstýri tikið aðra avgerð.

§ 38. Føroya Landsstýri kann áseta reglur um innretting av føsum, fyribils, skiftandi og uttandura arbeiðsplássium , herundir serligar fyriskipanir í samband við kolanáms- og bergholsarbeiði.

2. stk. Í nevndu reglum kunnu nýtast ávísingar til reglur og fyrisett mát,um hesi eru týðiliga ásett, herundir eisini dagfesting.

3. stk. Føroya Landsstýri kann eisini áseta reglur um:

1) at byggiætlanir o.tl. í sambend við bygging ella umbygging av virkjum, skulu sendast Arbeiðseftirlitinum til ummælis, áðrenn nevndu arbeiðir verða sett í verk.
2) at ætlanir um innrætting ella broyting av hølum, tekniskum útbúnaði o.a. skulu leggjast fyri Arbeiðseftirlitið til ummælis, ella góðkenning, áðrenn nevndu arbeiðir verða sett í verk, og
3) at bygningar, hølir o.tl. ikki mugu leigast út til vinnulig endamál fyrr enn spurningurin um hølini v.m. kunnu nýtast, til tað ætladi endamálið, hevur verið lagt fyri Arbeiðseftirlitið til ummælis ella góðkenningar.

KAPITTUL 6

Teknisk hjálpartól

§ 39. Teknisk hjálpartól skulu verða framleidd, og kunna nýtast soleiðis, at tey eru fullt forsvarlig viðvíkjandi trygd og heilsu. Reglurnar viðvíkjandi nýtsluni galda eisini fyri umsiting, reingerð, umvæling o.a.

2. stk. Góðkendar reglur og fyrisett mát, ið hava trygdar- og heilsuligan týdning, skulu fylgjast, hevur ikki Føroya Landsstýri avgjørt annað.

§ 40. Føroya Landsstýri kann áseta reglur um teknisk hjálpartól, herundir um:

1) at framleiðsla, innflutningur, avhending, framsýning ella nýtsla av serliga vandamiklum teknisk-um hjálpartólum skal verða bannað
2) at ætlanir um bygging, útinnan og uppseting av tekniskum hjálpartólum skulu leggjast fyri Arbeiðseftirlitið til ummælis ella góðkenningar.
3) at eitt teknisk hjálpartól skal vera góðkent av Arbeiðseftirlitinum, áðrenn tað verður avhandað ella latið til brúkaran ella tikið í nýtslu.
4) at teknisk hjálpartól skulu fráboðast til Arbeiðseftirlitið ella verða royndt ella aðrar eftirlitskanningar verða framdar, herundir eisini tíðarávísar kanningar.
5) at teknisk hjálpartól skal verða týðiliga merkt, soleiðis at tað er lætt at finna fram til framleiðarin ella innflytarin, fyri at vissa kann fáast fyri tey teknisku data, tólið hevur, slag, uppruna, góðkenning, royndir ella onnur viðurskiftir, sum hava týðning fyri arbeiðsumhvørvið.

2. stk. Í reglunum kunnu nýtast ávísingar til normar og fyrisett mát, um hesi eru líðiliga ásett, herundir eisini dagfesting.

KAPITTUL 7

Evni og tilfar

§ 41. Evni og tilfar, ið eru av slíkum slag, at tey kunnu verða vandamikil fyri, og minka um trygdina ella skaða heilsuviðurskiftini, mugu bert verða framleidd og verða nýtt í arbeiðsgerðum og arbeiðshettum, sum á tryggan hátt verja arbeiðsfólkini móti vanlukkum og sjúkum.

2. stk. Viðurkendar reglur og fyrisett mát, ið hava tryggleika- ella heilsuligan týðning, skulu fylgjast, hevur ikki Føroya Landsstýri ásett annað.

§ 42. Føroya Landsstýri kann áseta reglur um framleiðslu, innflyting, goymslu, flutning og nýtslu av evnum og tilfari, herundir um:

1) serliga merking av evnum og tilfari, ið nýtt verða í arbeiði, ella innpakking teirra,
2) skyldu til at seta í verk heilsufrøðiligar mátingar av loftdálking,
3) fráboðan um evnir og tilfar við skyldu til ávísing um viðurskiftir, sum hava týðning fyri metan um, hvussu vandamikið evnið ella tilfarið er,
4) at evni ella tilfar, ið kann verða vandamikið ella á annan hátt kann minka um trygdina og heilsustøðuna, ikki má nýtast, um hetta kann skiftast um við eitt vandaleyst, minni vandamikið ella minni ørkymlandi evni ella tilfar,

5) at evni ella tilfar, ið kann verða vandamikið ella á annan hátt kann minka um trygdina og heilsustøðuna, ikki má nýtast til ávíst endamál ella ianan serligt øki, áðrenn Arbeiðseftirlitsins góðkenning fyriliggur,
6) at teknisk datublað og líkn. frá framleiðara og innflytara av evni og tilfari skulu innihalda allar upplýsingar um evni ella tilfari og somuleiðis ta ávirkan hetta kann hava á trygdina og heilsustøðuna í arbeiðsumhvørvinum,
7) um brúkaravegleiðing frá útvegamonnum og arbeiðsgevarum.

2. stk. Føroya Landsstýri kann áseta reglur um bann móti framleiðslu, innflyting og nýtslu av evnum og tilfari, ið kunna verða vandamikil fyri, ella minka um trygdina og heilsustøðuna.

3. stk. Í reglunum um evni og tilfar kunnu nýtast normur og fyrisett mát, tá hesi eru týðiliga ásett, herundir eisini dagfesting.

4. stk. Arbeiðseftirlitið ásetir markvirði fyri evnir og tilfar, og eisini eitt yvirlit yvir evnir og tilfar, ið vera hildin at vera vandamikil ella minka um trygdina og heilsustøðuna.

KAPITTUL 8

Hvíldartíð og frísamdøgur

§ 43. Arbeiðstíðin skal skipast soleiðis, at tað í hvørjum samdøgri, roknað frá tí, at arbeiðið byrjar, skulu arbeiðsfólk hava eina hvíldartíð, ið er minst 11 samfeldar tímar.

2. stk. Hvíldartíðin kann minkast til í minstu lagi 8 tímar í:
1) arbeiði í fiskavirkjum í háveiðitíðini,
2) árstíðarbundið arbeiði í byggi- og verkayrki,
3) vaktarskifti á virkjum, sum hava vaktarskipan, tá partarnir á arbeiðsmarknaðinum semjast um tað.
4) inn- og uppskiping og tørvandi arbeiði, sum hoyrir til, sum goymslu og pakkhúsarbeiði, og
5) arbeiði í landbúnað.

§ 44. Arbeiðsfólk mugu ikki regluliga arbeiða sunnu- og halgidagssamdøgur, uttan so halgidagsarbeiðið er til samfelags frama ella er neyðugt at varveita virðir.

Halgidagssamdøgur skal liggja innanfyri skifti frá kl. 22.00 kvøldið fyri til kl. 08.00 morgunin eftir halguna.

2. stk. Sum endurgjald fyri mista frítíð orsaka av regluligum sunnudagsarbeiði, hava arbeiðsfólk rætt til aðra samfelda frítíð innan fyri eina viku, við at samsvarandi tal av arbeiðstímum dettur burtur.

§ 45. Tá náttúruviðurskifti, vanlukkur, maskinbrek ella tílíkt koma óvart á, og hava við sær, at ólag kemur í raksturin á virkinum, kunnu frávik gerast frá § 43 og 44, í tann mun, tað er avgerandi neyðugt, til regluligur rakstur aftur er fingin í lag. Frávikið skal skrivast í eftirlitsbókina ella annað líknandi skjal, sambært § 61.

§ 46. Frávik frá §§ 43-45 kunnu verða loyvd av Arbeiðseftirlitinum, tá:
1) útinnan av arbeiðinum ella arbeiðið er av slíkum slag, at tað kann ikki útsetast ella
2) at serligir arbeiðshættir gera frávik rímulig.

2. stk. Frávik frá einari einstakari hvíldartíð ella einum einstøkum frísamdøgri kann í hesum føri verða gjørt uttan at ein framumanundan hevur fingið loyvi til less, um tað hevur ikki borið til at útvegað nevnda loyvið í rættari tíð.

Frávikið skal skjótast møguligt skrivliga fráboðast Arbeiðseftirlitinum við avriti til trygdarum-boð/-álitisfólk.

3. stk. Frávik kunnu við avtalu millum avvarandi arbeiðsgevarafelag og arbeiðstakarafelag verða gjørd í lógarinnar ásetingum um hvíldartíð og frísamdøgur. Nevndu avtalur hava bert gildi, um tær eru góðkendar av Arbeiðseftirlitinum.

4. stk. Fyri fakøkir ella serligar arbeiðsgreinar, har serligar umstøður gera tað neyðugt, hevur Føroya Landsstýri heimild at gera frávik frá ásetingunum lógarinnar um hvíldartíð og frísamdøgur.

§ 47. Ásetingar í lógarinnar §§ 43 og 44 í lógini kunnu, um tað verður hildið neyðugt, frávikjast fyri:
1) persónar í hægri størvum, sum bert ella fyri ein stóran part útinna leiðandi arbeiði,og ikki hava skyldu til, hvat arbeiðstíðini viðvíkur, at fylgja teimum reglum, ið galda fyri tey arbeiðsfólk, teir skulu leiða, og ikki arbeiða eftir nakrari fastari skipan,
2) persónar í leiðandi størvum, ið vegna serkunnleika ella líknandi viðurskiftini hava eitt setligt sjálvstøðugt starv og
3) umboðssølufólk, ið hava arbeiði sitt uttanfyri tað fasta arbeiðsplássið á virkinum.

§ 48. Fyri arbeiði, sum í serligan mun kunna verða vandamikil fyri trygd og heilsu, hevur Føroya Landsstýri heimild til at áseta reglur um avmarkaða arbeiðstíð.

KAPITTUL 9

Børn og ung undir 18 ár

§ 49. Børn, ið ikki eru fylt 14 ár, mugu ikki hava vinnuligt arbeiði. Undantikið er tó lættari hjálparar-beiði 2 tímar um dagin. Viðvíkjandi børnum, sum hoyra til húski arbeiðsgevarans, so eru hesar reglur bert galdandi, tá tað snýr seg um arbeiði við tekn-iskum útbúnaði, maskinum, hjálpar-tólum og evn-um og tilfari, ið kunnu verða vandamikil fyri tey.

2. stk. Føroya Landsstýri kann áseta reglur um hægri aldursmark enn 14 ár fyri arbeiði, sum er av slíkum slag, ella at umstøðurnar eru soleiðis, at arbeiði kann verða vandamikið fyri trygdina, heilsuna og menningina av teimum ungu.

3. stk. Annars kann Føroya Landsstýri áseta reglur um, at børn yngri enn 14 ár kunnu hava lættari vinnuligt arbeiði.

§ 50. Arbeiðstíðin fyri ungfólk, sum eru yngri enn 18 ár, má í vanligum førum ikki fara út um tu vanligu arbeiðstíðina fyri vaksin, sum arbeiða innan sama yrkisgrein.

2. stk. Ung mugu ikki arbeiða meira enn 10 tímar falt um dagin. Arbeiðstíðin skal vera í einum, av-brotin av hóskandi mat- og hvíldartíðum.

3. stk. Føroya Landsstýri kann áseta serligar reglur um í hvønn mun ung, sum eru yngri enn 18 ár, kunnu arbeiða meira enn tu vanligu arbeiðstíðina innan viðkomandi yrkisgrein.

§ 51. Ungfólk, ið ikki eru fylt 18 ár, skulu hava eina samlaða hvíldartíð, sum er í minsta lagi 12 tímar um samdøgrið.

2. stk. Nevnda hvíldartíð skal vanliga umfatan tíðar-skeiði millum kl. 22.00 á kvøldi og kl. 05.00 á morgni.

3. stk. Fyri serlig yrki og arbeiðsøki, har umstøðurnar gera hetta neyðugt ella yskiligt, kann Føroya Landsstýri áseta serligar reglur um longd av hvíld-artíð og nær í døgninum henda skal verða.

KAPITTUL 10

Læknakanningar v.m.

§ 52. Fyri virkir, fak, faklig øki ella aðrar bólkar av starvsfólki, hvørs arbeiði kann hava við sær heilsu-vanda, kann Føroya Landsstýri áseta reglur um:

1) at starvsfólki skal kannast av læknu, áðrenn tey taka við starvi og meðan tey eru í starvi, og eisini aftaná at tey eru givin í starvinum, møguliga við regluligum læknakanningum.
2) at tað regluliga, ella í einstøkum føri, skulu gerast arbeiðsmedisinskar og arbeiðsheilsu-fræðiligar kanningar ella aðrar kanningar av heilsuviðurskiftunum.
3) Líknandi kanningar, við attiti til um arbeiðið kann hava við sær vanda fyri trygd og heilsu.

KAPITTUL 11

Arbeiðsumhvørvisráðið

§ 53. Landsstýrinum verður heimilað at seta eitt arbeiðsumhvørvisráð við einum umboði fyri arbeiðs-arafeløgini, einum umboði fyri arbeiðsgevarafeløg-ini, einum umboði fyri handverkarafeløgini, einum umboði fyri handverksmeistarafeløgini, einum um-boði fyri arbeiðstakarar innan skrivstovu- og kram-búðaryrki, einum umboði fyri arbeiðsgevarar innan skrivstovu- og krambúðaryrki og stjóranum fyri Ar-beiðseftirlitið, ið er formaður ráðsins.

2. stk. Landsstýrið tilnevnir umboðini og sama tal av tiltaksumboðum fyri eitt 4 ára starvsskeið.

3. stk. Landsstýrinum verður heimila at seta nærri reglur fyri virki ráðsins.

4. stk. Arbeiðsumhvørvisráðið skal hava allar kunn-gerðir, sum við heimild í hesari lóg verða settar í gildi til umtala, áðrenn tær fáa gildi.

KAPITTUL 12

Arbeiðseftirlitið

§ 54. Landsstýrið er hægstur fyrisitingarligi mynd-ugleiki viðvíkjandi arbeiðsumhvørvisspurningum í Føroyum.

2. stk. Føroya Landsstýri ásetir talið av eftirlitis-deildum í Føroyum í samráði við Arbeiðseftirlitið.

3. stk. Stjórin í Arbeiðseftirlitinum hevur tað dagliga leiðsluna av stovninum.

§ 55. Uppgávurnar hjá Arbeiðseftirlitinum eru, í spurningum um arbeiðsumhvørvi í Føroyum, at:

1) vegleiða virkjunum, pørtunum á arbeiðsmarknaðinum og almenningin í spurningum, ið hava arbeiðsumhvørvisligan týðning,
2) hjálpa Føroya Landsstýri við fyrireikingunum av reglunum, sambært lógina,
3) áseta nærri fyriskipanir við heimild frá Føroya Landsstýri,
4) kunna seg um teknisku og sosialu menningina, í samfelagnum, við atliti til, at betra um arbeiði, viðvíkjandi trygd og heilsu í arbeiðsumhvørvinum,
5) viðgera ætlanir til framleiðsluhættir, arbeiðspláss, teknisk hjálpartól v.m. og evnir og tilfar, og geva loyvir, sum eru í tráð við lógina ella fyrisitingarligar reglur,
6) Ansa eftir, at lógin og tær fyrisetingar, sum verða gjørdar við heimild í lógini, verða hildnar.

§ 56. Føroya Landsstýri kann geva stjóranum fyri Arbeiðseftirlitinum heimildir, sum sambært lógina hoyra undir Landsstýrinum.

§ 57. Føroya Landsstýri kann gera av, at eitt nærri avmarkað arbeiðsøki hjá Arbeiðseftirlitinum verður lagt til aðrar almennar myndugleikar, ella privatan stovn. Landsstýrið kann eisini gera av, í hvønn mun Arbeiðseftirlitið skal hava eftirlit við hesum.

2. stk. Føroya Landsstýri kann áseta reglur um góðkenning av royndunum ella øðrum prøvtilfari, sum vísir, at reglurnar verða fylgdar, viðvíkjandi trygd og heilsu.

3. stk. Føroya Landsstýri kann áseta reglur um gjald ella fast avgjald fyri tær kanningar v.m., sum Arbeiðseftirlitið ger ella skipar fyri.

§ 58. Føroya Landsstýri kann áseta reglur um fráboðanarskyldu av arbeiðsvanlukkum, citringum, vinnulígum sjúkum, og øðrum viðurskiftum, av arbeiðsumhvørvisligum týðningi.

2. stk. Tann, sum í arbeiði sínum fyri ta almenna, ella tann, ið fyri tað almenna umboðar onkran stovn, og fer kunnleika um viðurskifti, sum bróta fyrisetingarnar í hesari lóg ella teimum reglum, sum við heimild í hesi lóg eru lýstar galdandi, skal uttan dvøl boða Arbeiðseftirlitinum frá hesum.

3. stk. Verður ein lækni varugur við, ella fer fruenir av, at onkur í arbeiði sínum hevur verið fyri skaðligum árinum, skal hann beinanvegin siga Arbeiðseftirlitinum frá hesum. Føroya Landsstýri kann áseta nærri reglur um hetta.

§ 59. Øll, sum sambært lógina hava álagdar skyldur, skulu eftir áheitan geva Arbeiðseftirlitinum alla upplýsingar í neyðugar eru fyri virkið hjá eftirlitinum.

2. stk. Eftirlitsfólk hjá Arbeiðseftirlitinum hava til eina hvørja tíð myndugleika til uttan rettarúrskurð at kanna almenn og privat virkir, tó treytað av, at tey kunna prógva, hvørji tey eru. Um neyðugt hjálpir løgreglan í hesum sambandi til.

3. stk. Eftirlitsfólkið hjá Arbeiðseftirlitinum kunna eisini uttan rettarúrskurð krevja atkomilig skjøl útflýggjaði, taka fotomyndir og taka vissar royndir til nærri kanningar. Arbeiðsgevaria ella umboðsmaður hansara skulu hava fráboðan um hetta.

§ 60. Arbeiðseftirlitið kann krevja, at viðurskifti, ið ikki eru í tráð við lógarinnar reglum ella avgerðum, sum tiknar eru við heimild í lógini, beinanvegin ella áðrenn eina av Arbeiðseftirlitinum ásetta freist verða fingin í rættlag.

2. stk. Um Arbeiðseftirlitið heldur tað vera neyðugt at byrgja fyri munandi og hóttandi vanda fyri trygdina og heilsuna hjá arbeiðsfólki ella øðrum, kann Arbeiðseftirlitið krevja, at nevndi vandi beinanvegin verður beindur burtur, herundir:

1) at arbeiðsfólkini beinanvegin rýma úr vandaøkinum,
2) at øll nýtsla av einum tekniskum hjálpartóli, evnum ella tilfari beinanvegin verður steðgað, og
3) at alt arbeiði á nevnda øki verður steðgað.

3. stk. Stjórin fyri Arbeiðseftirlitið kann krevja, at tann ið útflýggjar ella marknaðarføring teknisk hjálpartól, persónliga verndarútgerð ella evni og tilfar, sum hóast hetta verður nýtt sum fyriskrivað, kortini vísir seg at verða til ampa fyri trygd og heilsu, skal syrgja fyri, at neyðug tiltøk verða framan, so sleppast kann undan hesum.

Tað kann soleiðis krevjast:

1) at útflýggingin ella marknaðarføringin verður steðgað,
2) at viðkomandi tekniska hjálpartól, persónliga verndarútgerð ella evni og tilfar verður aftur-kallað frá marknaðinum.

§ 61. Arbeiðsgevarin skal, tá ið Arbeiðseftirlitið krevur tað, siggja til, at ein eftirlitsbók er til taks á hvørjum arbeiðsplássi. Eftirlitið skal her føra við-

merkingar um útint eftirlit, og skulu eftirlitsfrágreiðingar og annars øll skrivlig boð frá Arbeiðseftirlitinum goymast her.

Arbeiðseftirlitið ásetur annars, hvussu eftirlitshókin skal nýtast og goymast.

§ 62. Myndugleikar og persónar, sum eru sett til at útinna uppgávur eftir kap. 10-12, eins og hvør tann sum hjálpir til við hesum arbeiði, hava tagnarskyldu.

2. stk. Eftirlitsfólk hjá Arbeiðseftirlitinum, mugu ikki geva arbeiðsgevara ella umboðsmanni hansara upplýsingar um, at ein eftirlitsvitjan er gjørd orsaka av eini klagu.

§ 63. Føroya Landsstýri kann áseta nærri reglur um samstarvið millum Arbeiðseftirlitið og aðrar almennar myndugleikar.

KAPITTUL 13

Kærur

§ 64. Tær avgerðir, sum Arbeiðseftirlitið tekur, kunna kærast til Føroya Landsstýri innan 4 vikur eftir at viðkomandi hevur fingið boð um avgerðina.

2. stk. Rættstundis kæra er tálmandi, til avgerð frá kærumynduleikanum er tikin, ella til kæru-myndugleikin tekur aðra avgerð.

Kæra um avgerðir líknar eftir § 60, 2. stk. er ikki tálmandi.

3. stk. Føroya Landsstýri kann áseta, at avgerðir ikki kunna kærast til Landsstýrið.

KAPITTUL 14

Kriminalrættsligar fyriskipanir

§ 65. Um ikki hægri revsing er heimilað sambært aðrari løggávu, verður við bót, hefti ella fongsul uppí eitt ár, hann revsaður ið:

1) fremur brot á §§ 11-18, 1. stk., §§ 21-30, § 33, 1. stk., § 34, 1. stk., § 37, 1. stk., § 39, 1. stk., § 41, 1. stk., § 58, 2.-3. stk., § 59, 1. stk. og § 61,
2) letur arbeiði útinna, ið stríðir ímóti ásetingunum í kapittlunum 8 og 9, leiðir ella hevur eftirlit við slíkum arbeiði ella útinnir arbeiði, ið stríðir ímóti kapittul 8,
3) ikki ger eftir boðum givin eftir § 60 ella
4) letur vera við at geva upplýsingar eftir § 18, 2. stk.

2. stk. § 23 í revsilógini um medvirkan er eisini galdandi fyri revsiábyrgdina, sum nevnd er í stk. 1.

§ 66. Fyri brot á §§ 11-13, § 34, 1. stk, § 39, 1. stk., og § 41, 1. stk., umframt viðurskiftir sum eru fevnd av § 65, stk. 1, nr. 2 og 3, kann arbeiðsgevarin verða sektaður við bót, sjálvt um brotið kann ikki roknast gjørt við vilja ella ósketni.

§ 67. Í ásetingunum, sum eru lýstar galdandi sambært hesa lóg, kunna ásetast reglur um bøtur fyri brot á ásetingarnar og boð ella bann, sum eru sett eftir ásetingunum.

Eisini kann ásetast, at ein arbeiðsgevari kann sektast við bót fyri brot á ásetingar, boð ella bann sum nevnt, sjálvt um brotið kann ikki roknast gjørt við vilja ella av ósketni.

§ 68. Bót, sektin sambært § 66 og § 67, 2. punktum kann ikki áleggjast virkisleiðarum og øðrum jmb. § 19.

§ 69. Fyri brot, sum verða framd av partafeløgum ella lutafeløgum ella líknandi, kunna sjálv feløgini verða sektað.

2. stk Er brotið framt av heimastýrinum, einari kommunu ella komunufelagnum, kann heimastýrið, kommunan ella kommunufelagið verða sektað.

§ 70. Tá ung undir 18 ár verða sett í arbeiði, sum er í stríð við reglurnar í hesi lóg ella teimum ásetingum, sum eru lýstar galdandi, sambært hesa lóg, kann tann, sum hevur foreldramyndugleikan, verða sekta, um so er, at viðkomandi er vitandi um, at arbeiðið er farið fram.

KAPITTUL 15

Gildi og fyrihilsreglur

§ 71. Henda lóg kemur í gildi 1. september 1996 og samstundis fara úr gildi:

Løgtingslóg nr. 58 frá 24. mai 1974 um arbeiðsmiðvernd, sum broytt við løgtingslóg nr. 81 frá 26. mai 1982 og løgtingslóg nr. 44 frá 5. mai 1987.

2. stk. Fylgjandi reglur, sum eru lýstar galdandi við heimild í teimum í 1. stk. nevndu lógum, verða framvegis galdandi við teimum í hesi lóg fylgjandi broytingum, til tær verða settar úr gildi ella til tær verða avloystar av reglum lýstar galdandi við heimild í hesi lóg:

Kunngerð nr. 126 frá 04.09.1995 um trygdararbeiði á virkjum og arbeiðsplássum.

1) Kunngerð nr. 127 frá 04.09.1995 um trygdarskeið.

2) Kunngerð nr. 128 frá 04.09.1995 um lyftiútgerð og spøl (kranar).

3) Kunngerð nr. 129 frá 04.09.1995 um innrættning av tekniskum hjálpartólum.

4) Kunngerð nr. 131 frá 04.09.1995 um persónliga verndarútgerð.

5) Kunngerð nr. 132 frá 04.09.1995 um trygdarkrøv v.m. til persónliga verndarútgerð.

6) Kunngerð nr. 133 frá 04.09.1995 um flytbar trýstíløt við innihaldi.

7) Kunngerð nr. 134 frá 04.09.1995 um markvirði fyri óljóð á arbeiðsplássum.

8) Kunngerð nr. 135 frá 04.09.1995 um reglur fyri arbeiði á skipum við tangum til olju o.a.

9) Kunngerð nr. 136 frá 04.09.1995 um reglur fyri byggipláss og líknandi arbeiðspláss.

10) Kunngerð nr. 102 frá 19.07.1990 um aldursmark at passa ávísar maskinur á flaka- virkjum v.m.

11) Kunngerð nr. 139 frá 02.10.1992 um skyldur hjá læknum og tannlæknum at siga Arbeiðseftirlitinum frá vinnusjúkum.

12) Kunngerð nr. 14 frá 24.01.1990 um fráboðan av arbeiðsvanlukkum.

13) Kunngerð nr. 110 frá 29.10.1982 um elevatorar, dampketlar, trýstíløt og nýtslu av asbest, sum broytt við kunngerð nr. 26 frá 14.03.1983.

14) Kunngerð nr. 59 frá 18.07.1985 um loyvisbrev til at koyra gaffiltrukk.

15) Kunngerð nr. 106 frá 19.10.1982 um innandura trukkkoyring, sum broytt við kunngerð nr. 46 frá 17.05.1984.

16) Kunngerð nr. 89 frá 12.11.1979 um kranføraraprógv.

17) Kunngerð nr. 138 frá 03.12.1990 um kavaraútgerð, um tryggleika og um læknakanning hjá kavarum.

18) Kunngerð nr. 26 frá 01.03.1994 um kavaraskeið og kavararoyndir.

20) Kunngerð nr. 57 frá 09.05.1994 um góðkendar kavaraskúlar.

21) Kunngerð nr. 15 frá 24.01.1990 um frysti- og kuldaútbúnaðarinnrættningi.

1) Kunngerð nr. 82 frá 30.08.1984 um trygdartiltøk við nýtslu av geislavirknum evnum.

1) Kunngerð nr. 11 frá 30.01.1980 um goymslur til spreingievni.

24) Kunngerð nr. 84 frá 25.08.1983 um evni og tilfar.

25) Kunngerð nr. 120 frá 20.09.1990 um flokking, innballing, merking, sølu og goymslu av vandamiklum keminskum evni og tilfari.

26) Kunngerð nr. 130 frá 17.10.1990 um lista yvir vandamikil evnir.

27) Kunngerð nr. 131 frá 07.10. 1990 um epoxyharpiks og isocyanater v.m.

28) Kunngerð nr. 80 frá 21.04.1993 um bandil við ethanoli.

29) Kunngerð nr. 72 frá 23.06.1987 um reglur fyri Arbeiðsumhvørvisráðið.

VIÐMERKINGAR
til lógaruppskotið.

Inngangur:

Eftir áheitan frá Føroya Landsstýri hevur Arbeiðsumhvørvisráðið arbeitt við uppskoti til nýggja lóg um arbeiðsumhvørvi.

Limirnir í Arbeiðsumhvørvisráðnum eru:

1. Jógvan Vágsheyg	Føroya Arbeiðsgevarafelag
2. Ingeborg Vinther	Føroya Arbeiðarafelag
3. Óla Jákup Guttesen	Føroya Handverksmeistarafelag
4. George Nielssen	Føroya Handverkarafelag
5. Tummas Hanus Dam	Føroya Keypmannafelag
6. Birgerð Klein	Føroya Skrivstovu- & Kramb.felag
7. Eli Davidsen.	Arbeiðseftirlitið, formaður.

Sum varalimir (í somu nummarrøð) eru tilnevndir:

1. Arni Poulsen
2. Karl Johansen
3. Regin Joensen
4. Leivur Nygaard
5. Regin Andreasen
6. Erhard Jacobsen

Ráðið hevði fyrsta fund sín 15. februar 1988, har nevnda lógaruppskot var til viðgerðar.

Síðani eru bildnir 12 fundir og hevur Arbeiðsumhvørvisráðið á fundi tann 12. des. 1990 gjørt endaligt tilmæli um nýggju arbeiðsumhvørvislóg.

Viðmerkingar til lógaruppskotið.

Alment:

Sum grundarlag fyri hesum lógaruppskoti hevur ráðið havt lógina, sum galdandi er í Grønlandi um arbeiðsumhvørvi.

Grundin til at hendan lóg er nýtt sum fyrimynd fyri føroyska lógaruppskotinum er tann, at ráðið metir umstøðurnar og viðurskiftini annars í Føroyum og Grønlandi vera so lík, at stórir partar av grønlendsku lógini eisini passa til okkara viðurskifti.

Ráðið hevur tó eisini kannað rættarstøðuna í hinum grannalondum okkara og hevur ordaskifti verið um ymiskar reglur, sum galdandi vóru í hesum londum, og um tær áttu at verið settar í gildi í Føroyum eisini.

Høvuðsendamálið hjá ráðnum hevur tó verið at skapa eina lóg, sum er tillagað eftir teimum serføroysku viðurskiftunum og hevur ráðið gjørt endaliga uppskot sítt út frá hesum sjónarmiði.

Fíggjarligar avleiðingar:
Við heimild í verandi lóg um arbeiðsarvernd, eru fleiri kunngerðir á arbeiðsumhvørvisøkinum, longu settar í gildi fyri Føroyar.
Tað hevur havt við sær at viðkomandi stovnar, bæði fíggjarliga og umsitingarliga, hava tikið hædd fyri teimum broytingum, ið lógaruppskotið leggur upp til.
Sostatt skuldi lógaruppskotið ikki havt stórvegis fíggjarligar avleiðingar.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

Viðv. § 1:

Hendan grein ásetir endamál lógarinnar og er betta tað sama, sum galdandi er í Danmark og hinum grannalondum okkara.

Viðv. § 2:

Greinin ásetir øki lógarinnar og er her eisini talan um sama øki, sum galdandi er í hinum norður-londunum.

Viðv. § 3:

Hendan grein ásetir nærri fyriskipan um, í hvønn mun lógin er galdandi fyri loftferðslu, sjóvinnu og fiskivinnu.

Orsøkin til at lógin ikki í sínari heild er galdandi fyri hesi økir er tann, at umstøðumar her eru so serstaktar, at ráðið eins og lógsmiðirnir í grannalondum okkara ikki meta, at arbeiðsumhvørvis-lóg, sum galdandi er á landi, í fullan mun er nýtilig fyri loftferðslu, sjóvinnu og fiskivinnu.

Ráðið hevur ikki sett uppskot fram um at fiskivinnan, sum er høvuðsvinna okkara, verður tikin við í hesa lóg, men ráðið loyvir sær at vísa á, at ein støðugt størri partur av fiskiflota okkara hevur verksmiðjur, har arbeiðið ikki stórvegis víkir frá arbeiðsumstøðunum innan fiskivinnuna á landi, og eigur tí at verða miðað ímóti, at samstarv fæst ímillum t.d. Arbeiðseftirlitið og Skipasýnið um at samskipa arbeiðið soleiðis at støðið, tá hugsa verður um arbeiðsumhvørvið t.d. viðvíkjandi trygd, í tann mun hetta ber til, verður tað sama fyri verksmiðjuarbeiði á sjógv og á landi.

Viðv. § 4:

Sambært hesari grein, skal trygdararbeiði í størst møguligan mun fara fram á sjálvum virkinum og er ein grundin til hesa skipan tann, at ógjørligt er hjá Arbeiðseftirlitinum at hava dagligt eftirlit av tí sum fyriferst innanfyri vinnuvirkir.

Sambært hesari grein, verður tað eisini serliga víst á, at eisini tá talan er um minni virkir t.e. virkir, har minni enn 10 fólk starvast, hevur leiðsla og starvsfólk skyldu til at vísa aðsni viðvíkjandi arbeiðsumhvørvis-trupulleikum, sum kunnu stinga seg upp.

Viðv. § 5:

Talið á arbeiðsfólki er í hesum uppskoti sett til 10, og er tað sama tal, sum í t.d. Danmark og Grønlandi.

Viðvíkjandi 2. stk. í frammanfyri nevndu grein er at viðmerkja, at ætlanin við hesari skipan er, í størst møguligan mun at miðspjaða trygdararbeiði, sum gjørt verður.

Trygdarbólkarnir verða skipaðir innanfyri hvørt arbeiðsøki og er hetta liður í sama miðspjaðing.

Arbeiðsleiðarin hevur vanliga beinleiðis leiðsluna og eftirlit við arbeiðsøkinum og verður tað tí mett náttúrligt, at hann er annar parturin í trygdarbólkinum.

Í sambandi við 3. stk. er at viðmerkja, at tað eru starvsfólkini, sum velja trygdarumboð og skal við hesum skiljast, at tað eru øll, sum eru í starvi arbeiðsgevarans, fróknað lærlingar, starvsmenn og onnur, sum tó ikki skulu hava beinleiðis leiðslurætt.

Viðvíkjandi 4. stk., er heimild til hjá Arbeiðseftirlitinum at veita undantak frá kravinum um serligar trygdarbólkar, men hevur ráðið lagt serligan dent á, at hetta bert eigur at verða gjørt, har vissa er fyri, at hetta ikki førir við sær verri trygdarstøða enn tann, sum fyriskipa verður samsvarandi hesari lóg.

Viðv. § 6:

Tá ið tosað verður um umboð fyri arbeiðsgevaran ið hevur ábyrgdina av virkinum, skal hetta skiljast sum persónur, sum kann taka avgerðir arbeiðsgevarans vegna viðvíkjandi teimum trygdar og heilsuviðurskiftum, sum skulu viðgerast í trygdarnevndini.

Uppgávan hjá trygdarnevndini er m.a. at vera ráðgevi arbeiðsgevarans í sambandi við trygdar- og heilsuspurningar.

Nevndin hevur harafturímóti ikki heimild til at taka avgerðir í samband við fremjan av trygdar- og heilsutiltøkum á virkinum.

Tá arbeiðsgevarin ella hansara umboð eru limir í nevndini, vil tað vanliga tó vera soleiðis, at arbeiðsgevarin er samdur í og fylgir teimum ráðum, sum nevndin gevur.

Viðv. § 7:

Ráðið metir, at trygdarnevndin á teimum einstøku virkjunum, eigur at tilnevna ein dagligan leiðara av trygdararbeiðinum, soleiðis at hesin kann fyriskipa dagliga arbeiði hjá nevndini.

Ein fyritreyt er sjálvsagt, at arbeiðsgevarin letur viðkomandi ta tíð, sum neyðug er, fyri at gera slíkt arbeiði.

Viðvíkjandi øðrum petti kann viðmerkjast, at ráðið er av tí áskoðan, at Landsstýrið bert í serstøkum førum eigur at gera frávik frá reglunum í hesari lóg.

Eisini hevur Landsstýrið sambæt nevndu grein rætt til at laga reglurnar eftir teimum serligu viðurskiftunum á ávísum arbeiðsplássum og kann ráðið her vísa sum dømi, at talan kann vera um arbeiðspláss innan byggivirksemi, handlar, hotel og matstovuvinnu, reingeringsvinnu, flutningsvinnu umfram skrivstovu og fyrisiting.

Ráðið viðmerkir í hesum sambandi, at tað sjálvsagt í øllum førum má vera soleiðis, at trygdin ikki verður sett til viks, og at frávik bert verða gjørd, har haldgóðar metingar vísa, at trygdarviðurskiftini eru nóg vel vard, eisini við teimum broytingum, sum Landsstýrið í teimum einstøku førunum fremur.

Viðv. § 8:

Tað kemur sjálvsagt at vera ymist frá virki til virki, og m.a. grundað á stødd og arbeiðsumstøðurnar, hvussu long tíð náttúrliga verður nýtt til trygdar og heilsuarbeiði.

Fyrst og fremst er tað arbeiðsgevarin, sum avger, hvussu nógv tíð skal setast av til slíkt arbeiði.

Verður ósemja um ta tíð sum nýtast skal til slíkt arbeiði, kann málið leggjast fyri eftirlitsumdømið.

Avgerðin frá eftirlitsumdømingum kann sambæt grein 64 kærast til Arbeiðsumhvørvisráðið og ráðsins avgerðir kunnu síðani kærast til Landsstýrið.

Viðvíkjandi 2. petti kann viðmerkjast, at tað eisini í hesum føri í fyrstu atløgu er arbeiðsgevarin, sum metir um trygdarbólkarnir og trygdarnevndirnar skulu luttaka í teimum ymisku ráðleggingunum og kann avgerð arbeiðsgevarans sambæt grein 54 kærast inn fyri Arbeiðseftirlitið.

Viðari kærumøguleiki er sum frammanfyri ásett heimilaður í grein 64.

Viðvíkjandi 4. petti vísir ráðið á, at arbeiði hjá trygdarbólkunum og trygdarnevndunum eru av alstórum týdningi fyri alt trygdararbeiði og eigur hetta arbeiði tí at vera vel lagt til rættis, fyri at fáa sum mest burturút.

Tað er ráðsins meting, at náttúrligt er at taka trygdarbólkin og trygdarnevndina við í samband við at virkið leggur til rættis arbeiðsgongd og innretting av arbeiðsplássi.

Tað eigur tí at vera ein fyritreyt, at bæði trygdarbólkurin og trygdarnevndin fáa høvi til at luttaka í teimum ætlanum, sum gjørdar vera, áðrenn virkið tekur endaliga støðu í slíkum málum.

Viðv. § 9:

Arbeiðsgevarin hevur eftir 1. petti skyldu til at rinda allar tær útreiðslur og inntøkumiss, sum trygdarumboði verður fyri, í samband við trygdararbeiði.

Her eru eisini fróknaðar útreiðslur og inntøkumissur í sambandi við luttøku av teimum í § 8 nevndu ráðleggingum.

Ráðið kann í hesum sambandi viðmerkja, at ein ástøðumannaavgerð í fakligum gerðarrætti 4. juli 1975 í Danmark, nærri vísir, hvat prøvtilfar skal til, fyri mistari inntøku.

Málið snúði seg um, at virkið bert vildi gjalda trygdarumboðnum ta vanligu tímalønina, hóast trygdarumboðið hevði starvast við akkordskipan, og soleiðis hevði havt eina hægri løn.

Ástøðumaðurin kom til ta niðurstøðu, at viðkomandi starvsfólk skuldi hava endurgjald fyri tann veruliga lønarmissin, t.v.s. samsvarandi tí akkordløn, sum viðkomandi hevði fingið, um hann hevði starvast tann dag, skeiðvirksemi fór fram.

Viðvíkjandi 2. petti er at viðmerkja, at ráðið heldur tað vera rætt, at Landsstýrið fær møguleika fyri, hvar tørvur er á hesum at áseta reglur um at landskassin letur tilskot til tær frummanfyri nevndu útreiðslur.

Viðvíkjandi 3. petti er at viðmerkja, at ráðið metir at tað er náttúrligt, at limirnir í trygdarskipanini á sama hátt sum álitisfólkið, eru vardir móti uppsøgn.

Hetta skal forða fyri, at tey fólk, sum luttaka í trygdarskipanini, skulu kunna koma undir trýst frá arbeiðsgevaranum, í samband við útinning teirra av trygdararbeiðinum.

Sjálvt um neyðugt verður hjá virkjunum at minka um arbeiðsmeginu, kann arbeiðsgevarin ikki uttan víðari siga trygdarumboðið úr starvi.

Viðvíkjandi 4. stk. er at viðmerkja, at danska lógin leggur heimildina til at avgera hesar trætur til Arbeiðsrættin.

Av tí, at vit ikki hava Arbeiðsrætt í Føroyum, metir ráðið, at vanligu dómstólarnir eiga at hava

hesar heimildir, har fakliga gerðarrættarskipanin ikki kann nýtast. Sama skipan er galdandi í Grønlandi.

<u>Viðv. § 10:</u>

Ásetingarnar í hesari grein skulu síggjast í samanhangi við hinar reglurnar í kapittul 2 og er endamálið við øllum hesum ásetingum at royna at gera virkið fört fyri sjálvt at loysa teir trygdar- og heilsutrupulleikar, sum eru ella koma at vísa seg á virkinum.

Sum kannugt, so verður í ídnaðinum tikið í nýtslu ymisk nýggj evnir og nýggjar arbeiðsgongdir og metir ráðið tí, at Landsstýrið skal hava heimild til áseta nærri reglur um møguliga sakkøna hjálp, t.d. í slíkum førum.

Arbeiðsgevarin kann á ymiskan hátt lúka sínar skyldur, samsvarandi teimum reglum, sum Landsstýrið møguliga kemur at seta í verk, av tí at avgerandi í slíkum førum er, at tað í veru-leikanum verður latin tann sakkøna hjálp sum neyðug er.

Arbeiðsgevarin hevur soleiðis í fyrstu atløgu rættin til at meta um, hvussu henda sakkøna hjálp kann fáast til vega.

Í hesum føri verður eisini víst til teir kærumøguleikar, sum eru ásettir sambæt seinni greinum í hesari lóg.

Kapittul 3

Hetta kapittul ásetir grundleggjandi skyldurnar hjá arbeiðsgevara, arbeiðsleiðarum, starvsfólki, útvegsmonnum, innleggjarum, umvælarum, ráðleggjarum o.ø.

Í mun til galdandi lóggávu er talan um eina viðkan av tí persónshólki, og eisini av teimum skyldum sum álagt verður hesum bólkum.

Viðv. § 11:

Í samband við hesa grein, hevur tað alstóran týdning at áseta nærri, hvat liggur í fyribrigdinum arbeiðsgevari, av tí, at tað bert er hann, sum sambært § 66 og 67 í uppskotinum hevur objektiva ábyrgd og kann dømast bót, grundað á tey brot, sum nevnd eru í frammanfyri nevndu lógargrein.

Sambært rettarpraksis, so er undir núgaldandi skipan í Danmark, persónur, sum hevur havt ein sjálvstøðugan lut í útinnanini av arbeiðinum, dømdur sambært objektiva arbeiðsgevarareglunum, men skal tað nú bert vera sjálvur arbeiðsgevarin, sum eigur at kunna dømast sambært nevndu grein.

Undir núgaldandi skipan, hevur objektiva ábyrgdin t.d. verið løgd á stjórar í partafeløgum og býarverkfrøðingar hjá kommunum.
Broytingin í lógarreglunum í Danmark grunda seg á fyrireikingararbeiði, sum gjørt var í nevnd, hvørs niðurstøða var latin løgmálaráðnum 03.11.1975.

Í nevndu niðurstøðu verður sagt, at objektiva ábyrgdin bert eigur at vera álagd virkiseigarum, soleiðis at skilja, at tað er tann persónur sum fær fíggarligan vinning av rakstrinum av virkinum.

Útfrá hesum hevur danska arbeiðsmálaráðið allýst arbeiðsgevaran sambært arbeiðsumhvørvislógini, soleiðis at tað er tann persónur sum eigari av virkinum, partvís hevur avgerandi heimildirnar, tá hugsað verður um at leggja til rætts arbeiðsgongdina á virkinum, og bygnaðin, og partvís heinleiðis hevur fyrimunin av rakstrarúrsliti hjá virkinum. Har talan er um virkir sum eru bygd upp sum kollektivar eindir, t.d. partafeløg, lutafeløg ella líknandi, vil objektiva ábyrgdin sum høvuðsregla verða gjørd galdandi móti kollektivu eindini sum soleiðis.

Um vit leggja hesa allýsing til grund, má talan vera um eina broyting í mun til tað sum vit nú leggja í orðið arbeiðsgevari sambært lógini, sum viðvíkjur arbeiðaravernd.

Hetta førir við sær, at vit t.d. í partafelag mugu meta nevndina/nevndarformannin sum arbeiðsgevari, meðan stjórin, um so er at hann ikki lúkar definitiónina sum nevnd er frammanfyri, nú eftir øllum at dømna bert má metast sum arbeiðsleiðari, tá ið vit tosa um reglurnar í lóg um arbeiðsumhvørvi.

Tá talan er um kommunur, so er tað bygdaráðsformaðurin/borgarstjórin, sum við atlati til hesa lóg má metast sum arbeiðsgevari.

Spurningurin um virkisleiðarar kunnu metast sum arbeiðsgevarar má tó metast útfrá hvørjum virki sær, við einari ítøkiligari meting, og í grannalondum okkara hava teir vist á, at har leiðarin í veruleikanum hevur eina støðu har hann hevur endaliga orðið, tá talan er um avgerðir sum takast skulu, so eigur møguleiki at vera fyri, eisini tá talan er um brot á lóg um arbeiðsumhvørvi at meta viðkomandi sum arbeiðsgevara.

Tann endaliga ásetingin av, hvør ið sambært lógina skal metast sum arbeiðsgevari, verður sjálvsagt ásett av rættinum.

Viðv. § 12:

Ráðið hevur mett, at møguleiki skal vera fyri hjá Arbeiðseftirlitinum at áseta nærri reglur um, hvat eigur at vera av útgerð til fyrstuhjálp á virkjum.

Eisini kann tørvur vera á serstakari skúðustovu ella øðrum útbúnaði á stórri virkjum, somuleiðis sum Arbeiðseftirlitið her kann krevja, at minst eitt fólk hevur tikið góðkent skeið í fyrstuhjálp.

Viðv. § 13:

Skyldan til at hava eftirlit snýr seg um tað arbeiði sum starvsfólki ger, og haraftur at, at arbeiðsgongdin annars er forsvarlig.
Tá mett verður um arbeiðsgevarin hevur hildið leiðbeiningar og eftirlitsskyldur sínar, má havast í huga, tann vandi, sum er tengt at tí einstøku arbeiðsgongdini, soleiðis at har arbeiðsgongdin er meira vandamikil, og har vandin fyri vanlukku ella heilsuskaða er størri, har eigur eftirlitið sjálvsagt eisini at vera strangari.

Viðv. § 14:

Í hvønn mun arbeiðsgevarin eigur at kunna arbeiðsfólkið, er partvís tengt at fyritreytunum hjá tí einstaka starvsfólkinum, og partvís av hvat slag av arbeiði talan er um.

Størri krav eigur at vera sett til kunningarskylduna hjá arbeiðsgevaranum, har talan er um arbeiði við serligum vanlukku og heilsuskaðiligum vanda.

Sama er galdandi har talan er um yngri starvsfólk og nýtt fólk sum kemur í starv, og soleiðis ikki hevur tað innlit sum neyðugt er, fyri á tryggan hátt at passa starv sítt.

Viðvíkjandi 2. petti kann viðmerkjast, at starvsfólki eigur at fáa upplæring og leiðbeining í nýtsla av verndartilføkum, eisini persónligum verndarfutum.

Eisini hevur arbeiðsgevarin skyldu til seinni at kanna, at ter áður givnu leiðbeiningar verða fylgdar av starvsfólkinum.

Viðvíkjandi 3. petti er at siga at bogsað verður het um økir, har serligur tørvur er á leiðbeining.

Viðv. § 15:

Heudan lógargrein vísir hvønn dent lógaruppskotið leggur á samstarvi á hvørjum einstøkum virki.

Umfram sjálvur at luttaka, ella lata umboð sítt luttaka í samstarvinum, skal arbeiðsgevarin eisini tryggja, at samstarvið støðugt heldur áfram á ein hóskiligan hátt.

Brot á hesa grein verða revsað sambert § 65.

Viðv. § 16:

Endamálið við lógargreinini er at ásetta samstarvsskyldu fyri fleiri arbeiðsgevarar á sama arbeiðsplássi til frama fyri trygdina og heilsuna, hjá øllum sum starvast á arbeiðsplássinum.

Mett verður at trygdin verður betur á arbeiðsplássinum, har hvør arbeiðsgevari ikki bert skal taka sær av trygdini hjá sínum starvsfólkum, men at ein samstarvsskylda eisini er galdandi millum allar arbeiðsgevaramar og øll tey starvsfólk, sum har starvast.

Orðið arbeiðsstað gevur rúmari ræstur enn orðið virki ella arbeiðsplass.

Viðvíkjandi 2. petti kann viðmerkjast, at Landsstýrið t.d. kann ásetu nærri reglur um at arbeiðs-gevararnir kunnu sínámillum avtala, hvør av teimum skal hava ábyrgdina av arbeiðsviðurskiftum á arbeiðsstaðnum.

Viðv. § 17:

Hóast nevndu grein, so hava øll sjálvsagt rætt til at venda sær til Arbeiðseftirlitið, í sambond við viðurskiftir sum snúgva seg um trygd og heilsu á arbeiðsplássum.

Um talan er um smá arbeiðspláss har hvørki trygdarumboð ella álitisfólk eru, skulu starvsfólkini hava kunnleika um tær avgerðir, sum Arbeiðseftirlitið hevur tikið.

Er talan um stór arbeiðspláss við fleiri deildum, so hevur trygdarumboðið bert krav uppá at fáa kunnleika um avgerðir frá Arbeiðseftirlitinum, sum snúgva seg um viðkomandi deild.

Sama er galdandi við álitisfólki, soleiðis at hesi skulu hava kunnleika um avgerðir sum snúgva seg um tann starvsbólk sum tey umboða.

Grundin til at nevnda regla bert viðger skrivligar avgerðir frá Arbeiðseftirlitinum er, at tær munnligu fráboðanirnar oftast ikki eru so nágreiniligar sum tær skrivligu.

Viðv. § 18:

Arbeiðseftirlitið kann krevja at kanningar verða settar í verk, bæði tá talan er um beinleiðis illgruna viðvíkjandi viðurskiftum á einum virki, og eisini sum lið í eini meira almennari kanning ella støðugum eftirliti av viðurskiftum innan eitt virkisøki.

Sjálvt um krav ikki er sett fram frá Arbeiðseftirlitinum um kanningar, hevur arbeiðsgevarin skyldu til, møguliga eftir tilmæli frá trygdarskipanunum at fremja kanningar á økjum, har trygdar og heilsuviðurskiftini gera tað neyðugt.

Til dømis skulu kanningar av tekniskum hjálpitólum ikki bert fremjast áðrenn hesi verða tikin í nýtslu, men tørvur kann eisini vera á at fremja kanningar aftan á møguligar broytingar av hjálpitólunum, ella annars við jøvnum millumbilum.

Har talan er um arbeiðsvanlukku ella óvanliga nógva sjúku hjá starvsfólkum, vil serligur tørvur ofta verða á at kanna arbeiðsviðurskiftini nærri.

Sjálvt um einki er nevnt í lógini um hetta, skal arbeiðsgevarin sjálvur rinda fyri tær kanningar, sum nevndar eru í hesari grein.

Viðv. § 19:

Grundin til at ráðið hevur sett inn hesa lógargrein, sum svarar til orðingina í § 23 í danskri lógini er, at sambært teir dómar, sum feldir eru á hesum øki, hevur verið ivasamt um leiðslan fyri t.d. partafelløgum kundi revsast sambært teimum greinum, sum seinni í hesari lóg áseta revsingar fyri brot á ásetingarnar í lógini.

Ætlanin við hesari lógargrein er, at teir persónar sum standa fyri leiðsluni av t.d. partafelløgum, eisini skulu kunna revsast fyri brot teir hava fraint á ásetingarnar í lógini.

Viðv. § 20:

Definitiónin av arbeiðsleiðara svarar til definitiónina í starvsmannalógini.

Tað er soleiðis ein konkret avgerð í hvørjum einstøkum føri, hvør kann metast sum arbeiðsleiðari og kann talan t.d. vera um driftsleiðarar, verkføraran, arbeiðsformenn og aðrar.

Tá talað verður um arbeiðið á virkinum ella pørtum av hesum, so kann eisini talan vera um arbeiði, sum verður gjørt uttandura.

Viðv. § 21:

Arbeiðsleiðarin skal sambæt orðingini síggja til at materiellu reglurnar í lógini verða fylgdar.

Sambæt § 65 er ábyrgdin hjá arbeiðsleiðaranum ikki objektiv.

Arbeiðsleiðarin skal sambæt orðingini taka tær neyðugu avgerðirnar innanfyri sítt heimildarøki, men haraftarat eigur hann at geva tilmæli um tiltøk, sum hann ikki sjálvur hevur heimild til at seta í verk, ella í hvussu er at geva arbeiðsgevaranum frábøðan um tørvin á slíkum tiltøkum.

Viðvíkjandi 2. petti er at viðmerkja, at sambæt orðingina, so hevur arbeiðsleiðarin bæði rætt og skyldu til at fremja tey neyðugu tiltøk tá talan er um brot ella brek.

Viðv. § 22:

Brot á hesa grein verða revsaði sambæt § 65.

Viðv. § 23:

Sambæt § 65, so kunnu arbeiðsfólkini eisini revsast, um tey ikki fylgja reglunum í hesari lóg.

Sum arbeiðsfólk er at skilja, hvør tann, sum verður settur í tænastu hjá arbeiðsgevara og sum ikki hevur leiðsluheimildir.

Arbeiðsfólki hevur ábyrgd av, at tey eisini halda tær materiellu reglurnar í lógini, umfram møguligum kunngerðum.
Tá 1. petti sigur at tiltøkini skulu virka sum ætlað, so ber hetta í sær, at t.d. verndartiltøk á maskinum og ítsúgvingarskipanir, eins og ásett persónlig verndartiltøk skulu nýtast.

Viðv. § 24:

Sí viðmerkingarnar til § 22.

Viðv. § 25:

Viðvíkjandi 1. petti, verður serliga hugsað um byggiarbeiði.
Viðvíkjandi 2. petti, kann talan t.d. vera um installatións - ella umvælingararbeiði.

Viðv. § 26:

Lógarreglan fevnir um eina og hvørja veiting, t.v.s. eisini har talan er um ikki vinnuliga veiting av brúktum tekniskum tólum ella amboðum, t.d. tá ið hetta verður latið uttan kostnað.

Ábyrgdin áliggur í flest øllum førum framleiðaranum ella innflytaranum, tá teir við atliti til sjálvar forhandlararnar mugu metast sum teir sakkønnu.

Millumhandlarar vilja vanliga bert hava ábyrgd, tá ið serligar umstøður gera seg galdandi.

Sambæt dómum í grannalondum okkara, so verður ábyrgdin heldur ikki løgd á starvsfólkt hjá t.d. innflytaranum.

Sambæt § 65 er revsiábyrgdin ikki objektiv.

Við teknisk hjálpartól er at skilja, t.d. stigar, stillasir, bingjur og tílíkt.

Leiðbeiningarnar eiga at vera orðaðar á føroyskum og skulu bert í undantaksføri orðast á øðrum máli, sum øll í Føroyum skilja.

Viðvíkjandi 3. petti skal viðmerkjast, at innflytari ella framleiðari, ikki bert tá ið Arbeiðseftirlitið krevur lað, men eisini tá ið viðurskiftini annars gera tað neyðugt, hevur skyldu til at frenja tær nevndu kanningar og royndir.

Viðv. § 27:

Henda lógargrein viðvíkir bert maskinum, meðan § 26 eftir orðingini hevur eitt meira alment gildi.

Sambæt § 30, so fevnir § 27 tó eisini um útvegamenn og aðrar, sum fáa til vega evnir og tilfar.

Viðv. § 28:

Hendan regla er eisini galdandi, um tað er framleiðari ella sølumaður sum fremur innleggingararbeiði, og sama er galdandi, um ein útleigari ella ein sum lænir út, sjálvur fremur innleggingina hjá leigaranum ella tí sum lænir.

Viðv. § 29:

Hendan áseting er orðað sambæt "ILO codes of Practice, Safety and health in building and civil engineering work" frá 1972.

Hetta er dømi um tann dent, sum lagdur eigur at vera á arbeiðsumhvørvisspurningin, longu frá byrjan av, tá ætlanir verða gjørdar.

Meiningin er tó ikki, at teir sum gera projektini, skulu leggja seg út í t.d. arbeiðsháttin hjá byggimeistarum og tey hjálpitól sum teir nýta, eins og lógarreglan heldur ikki tekur ábyrgdina frá byggimeistaram í samband við arbeiði teirra.

Viðvíkjandi seinasta punktum í lógargreinini skal viðmerkjast, at her er talan um ráðgeving, sum kann hava týdning fyri trygd og heilsu.

Reglun ber í sær m.a., at ráðgevandi verkfrøðingafeløg sum fremja útrokningar í samband við teknisk hjálpartól, skulu síggja til at hesi hjálpartól lúka krøvini, í arbeiðsumhvørvislógini.

Viðv. § 30:

Nærri fyriskipanir hjá innflytaranum eru ásettar í § 40 og 41.

Viðv. § 31:

Í samband við 2. petti kann viðmerkjast, at t.d. tá teknisk hjálpartól ikki lúka krøvini í arbeiðsumhvørvislógini, hevur umfram innflytarin og arbeiðsgevarin, eisini brúkarin ábyrgd.

Viðv. § 32:

Av tí at serligar umstøður kunnu vera, sum gera tað ráðligt at víkja frá almennt galdandi reglunum, hevur ráðið mett, at rætt er at taka við í lógina heildan møguleikan, fyri at gera frávik í reglunum.

Viðv. § 33:

Við byggiharra er vanliga at skilja, tann, fyri hvørs rokning byggiútbúnaðar ella umvælingararbeiði verður framt.
Neyðugt er ikki at byggiharrin er arbeiðsgevari og kann í hesum sambandi vísast til § 2, stk. 3, nr. 1.

Byggiharrin skal áðrenn byggiarbeiði verður byrjað, taka støðu til, um hann sjálvur skal átaka sær samskipanina ella um hann heldur letur ein annan samskipara fremja hetta arbeiði.

Um samskipanin ikki virkar sum hon skal, so kann byggiharrin ella samskipari hansara revsast við bót sambæri § 65.

Lógin tekur ikki støðu til um byggiharrin ella samskiparin koma undir endurgjaldsskyldu í teimum førum, har samskipanarskyldan ikki verður lokin.

Endamálið við greinini er at fáa samskipa tey felags trygdartiltøkini fyri tey ymisku virkisøkini á sama byggiplássi.

Byggiharrin og samskipari hansara hava bert skyldu til at samskipa trygdararbeiði á plássinum, meðan tað fult út eru teir einstaku arbeiðsgevararnir, sum hava ábyrgdina fyri at lógarinnar reglur verða hildnar viðvíkjandi teimum fólkum, sum teir sjálvir hava í starvi.

Kapittul 4:

Hetta kapittul ásetir grundleggjandi reglurnar, sum hava tilknýti til útinnanina av arbeiðinum.

Í sambandi við metingina av arbeiðsstøðunni, skulu reglurnar serliga samanberast við ásetingarnar í kapittul 5, 6 og 7.

Tað er ynskiligt, at spurningarnir um arbeiðsumhvørvi ikki bert verða tiknir til viðgerðar í sambandi við útinnanina av arbeiðinum, men longu tá ið tær fyrstu fyriteikningarnar verða framdar, í sambond við ætlað arbeiði.

Viðv. § 34:

Lagt eigur at vera til merkis, at bendan áseting sambæri § 2, stk. 3, nr. 2, eisini fevnir um arbeiði, sum ikki verður gjørt fyri arbeiðsgevara, umframt arbeiði, sum nevnt er í § 2, stk. 2.

Viðv. § 35:

Viðvíkjandi 1. petti, punkt 1 kann viðmerkjast, at bannið kann avmarkast til ávísar bólkar av starvsfólki, t.d. kvinnur við barn, eldri ella brekað.

Viðvíkjandi 2. punkti kann viðmerkjast, at á serligum arbeiðsplássum kann tørvur vera á ymiskum verndarlutum og serligum arbeiðsklæðum.

Viðv. § 36:

Í sambandi við at lógin verður sett í gildi verða nógvar kunngerðir, sum galdandi eru í løtuni, framvegis í gildi, til nýggjar kunngerðir verða gjørdar.

Kapittul 5: (Arbeiðsplássið).

Viðv. § 37:

Sum nevnt frammanfyri, so er tað av avgerandi týdningi, at atlit verður havt til arbeiðsumhvørvi og teir spurningar, sum upp kunnu stinga seg í hesum sambandi longu tá sjálvt arbeiðsplássið verður innrettað.

Krøvini til innrettingina verða sjálvsagt tengd at hvat slag av arbeiði talan er um, og hvørji hjálpartól, evnir og tilfar verða nýtt í arbeiðsgongdini.

Viðv. § 38:

Av tí at arbeiðsumhvørvislógin er ein rammulóg, eru ongar nágreiniligar reglur ásettar í lógini, um hvussu arbeiðsplássið skal innrettast.

Ætlanin er at reglurnar skulu ásetast frá umsitingini útfrá teimum almenna retningslinjunum, at arbeiði skal vera innrettað soleiðis, at tað lýkur øll trygdar og heilsulig krøv.

Serligur dentur skal leggjast á, at arbeiðsumhvørvi skal vera í tráð við ta teknisku og sosialu gongdina í samfelagnum.

Tær reglurnar, sum nærri verða ásettar frá umsitingini, kunnu t.d. snúgva seg um byggiháttin.

Teknisk hjálpartól eru eisini fevnd av hesari lógarheimild, í tann mun, nýtslan av hesum hava týdning fyri innrettingina av arbeiðsplássinum. Tað kann t.d. vera maskinur, sum halda nógvan gang.

Kapittul 6: (teknisk hjálpartól).

Ásetingarnar í hesum kapittli eru galdandi fyri øll, sum hava við teknisk hjálpartól at gera, bæði tann sum letur hjálpartólætlanina og hann, sum nýtir tólini, sjálvt um arbeiði ikki beinleiðis verður gjørt fyri ein arbeiðsgevara.

Her verður víst til § 2, stk. 3, nr. 3 í lógini.

Viðv. § 39:

Reglan í § 39 fevnir um øll sløg av skipanum, maskinum og hjálpartólum.

Talan kann verða um maskinur, amboð, elevatorar, kranar, stillasir, hingjur og annað.

Bæði hann sum letur nevndu hjálpartól og hann sum nýtir tey, hevur fulla ábyrgd fyri, at hesi tól eru framleidd og sett upp á forsvarligan hátt.

Skyldan í samband við nýtsluna áleggur tó bert brúkaranum, t.v.s. arbeiðsgevaranum, arbeiðsleiðaranum og starvsfólki, sum brúkar hesi tól.

Viðv. § 40:

Herdan lógaráseting gevur Landsstýrinum heimild til at áseta reglur um tey ymisku sløgini av hjálpartólum.

Her kann t.d. vera talan um ásetingar av markvirðum fyri óljóði, ristingum o.a. og er tað tí ikki nøkur beinleiðis treyt, at talan er um beinleiðis vandaumstøður, men kann Landsstýrið við atliti til trygd og heilsu, áseta slíkar reglur.

Viðvíkjandi stk. 1, 2. punkti, kann viðmerkjast, at sambært § 54, so er ætlanin at Arbeiðseftirlitið eftir áseting frá Landsstýrinum, fær heimild til at geva umnæli ella góðkenning, t.d. fyri ymiskar bólkar av tólum.

Um sokallað slaggóðkenning (typegodkendelse) verður givin, so fyrir hetta við sær, at maskinslagi til eina og hvørja tíð, kann seljast, so leingi sum maskinurnar halda tær ásetingar, sum liggja til grund fyri góðkenningini.

Tá tosað verður um umnæli, er hetta at skilja soleiðis, at ein meting fer fram av einstøkum viðurskiftum, sum hava munandi trygdar- ella heilsuligan týdning, og har sakkunnleikin hjá Arbeiðseftirlitinum ger slíka meting møguliga.

Tá tosað verður um góðkenning, er hetta at skilja á tann háttur, at ein nágreinilig gjøgnumgongd verður gjørd av ætlanini, har eftirlitið partvís metir tey einstøku viðurskiftini og ger eina heildarmeting, alt útfrá, hvat verður mett forsvarligt, við atlit til trygdina og heilsuviðurskiftini.

Talan kann t.d. vera um góðkenningar av ætlanum í samband við innretting av arbeiðsstað, og viðvíkjandi tekniskum hjálpartólum.

Viðvíkjandi 1. petti, nr. 3, kann viðmerkjast, at her kann m.a. vera talan um at Landsstýrið ásetir reglur, sum geva Arbeiðseftirlitinum møguleikar fyri at krevja sýn, av t.d. tekniskum hjálpartólum, áðrenn tey vera tikin í nýtslu.

Kapittul 7: (evni og tilfar)

Reglurnar um evni og tilfar hava ikki áður verið lógarfest í stórvegis mun, og er tað eisini fyri kortum, at grannalond okkara hava ásett nøkrar lógarreglur á hesum øki. Sum kunnugt verður framleitt nógv nýggj kemisk evnir, har ein partur hevur vístseg at vera heilsuskaðiligur.

Kanningar í grannalondum okkara hava víst, at kunnleiki er um meira enn 200.000 evnir, sum eru eitrandi, og hvørt ár økist hetta tal við uml. 5 - 6.000.

Mett verður tí, at tað er sera umráðandi, at fyribyrgjandi tiltøk verða sett í verk á øllum økjum.

Miðað eigur at vera ímóti, at einki evni ella tilfar, verður nýtt í framleiðsluni, áðrenn full greiða er fingin á, hvat árin hetta kann hava á menniskjalikamið.

Víst verður á, at reglurnar í hesum kapitli eisini eru galdandi fyri arbeiði, sum ikki verður framt fyri arbeiðsgevara, umfram tað arbeiði, sum nevnt er í § 2, stk. 2, samanborið við grein 2, stk. 3, nr. 4 í lógini.

Í Danmark hevur Arbeiðseftirlitið í samráð við Umhvørvismálaráðið frá 1977, skrásett evnir og tilfar, sum nýtt verður í arbeiðsumhvørvinum.

Viðv. § 41:

Lógargreinin fevnir um bæði framleiðara og brúkara, uttan aðrar avmarkingar enn tær, sum eru ásettar í § 3.

Evni og tilfar kann vera í føstum formi, flótandi ella í luftformi.

Evni fevnir um rávøru, og partvís og liðugt framleiddan árdrátt.

Sambært lógarregluni, so skal framleiðarin tryggja sær, at evnini og tilfarið, bæði í samband við framleiðsluna og í samband við nýtsluna, eru í einum slíkum formi, støðu, innbjálving v.m., soleiðis at arbeiðið kann fara fram, fult forsvarliga, við atliti til trygd og heilsuvanda.

Lógarreglan førir eisini við sær, at brúkarin (privatur, arbeiðsgevari, arbeiðsleiðari og starvsfólk) skulu tryggja sær, at tær arbeiðsgongdir, sum nýttar verða í arbeiðinum, greiti tryggja arbeiðarunum móti vanukkum og sjúku.

Brúkarin skal tí kanna, um tað evni og tilfar, sum brúkt verður, hevur vandamiklar eginleikar.

Í hesum sambandi kann hann fáa vegleiðing hjá Arbeiðseftirlitinum.

Viðv. § 42:

Tað sum nevnt verður í petti 1, 2, 3 og 4, eru bert dømi um tað, sum Føroya Landsstýri kann áseta nærri reglur um og kann sjálvsagt hugsast onnur umráðir, har tørvur eisini er á nærri fyriskipanum.

Viðvíkjandi 2. petti er at viðmerkja, at hendan lógarregla kann nýtast sum grundarlag fyri einum sonevndum negativ lista, sum antin verður galdandi alment, ella innanfyri ávís økir ella arbeiðir.

Kapittul 8: (hvíldartíð og frísamdøgur)

Hetta kapittul ásetir nærri reglur um hvíldartíð umframt undantaksreglur og serligar reglur innan ávís økir.

Reglurnar eru eisini galdandi fyri ung undir 18 ár, har ásetingarnar í kapittul 9 ikki hava givið hesum aldursbólki størri vernd.

Skyldu til at síggja til at starvsfólkið fær ta ásettu hvíldartíð og frísamdøgur, áliggur sambært revsiásetingini í § 65, arbeiðsgevaranum, arbeiðsleiðaranum og arbeiðsfólkinum.

Tann starvssetti kann ikki frásiga sær rættin til hvíldartíð ella frísamdøgur, uttan so, at heimild til tess beinleiðis er ásett í lógini, ella kunngerðum, sum skrivaðar eru út við heimild í lógini.

Skyldurnar eru bert galdandi í tí einstøku starvssetanini og forðar tí ikki fyri, at starvsfólkið tekur annað starv hjá øðrum arbeiðsgevara, og samlaða starvstíðin sostatt fer út um lógarinnar mark.

Viðv. § 43:

Tá nevnt verður at roknað verður frá tí at arbeiði byrjar, so er við hetta at skilja, tann tíð sum avtalað er millum arbeiðsgevaran og arbeiðsfólkið, um nær starvstíðin byrjar ella at henda starvstíð er ásett í høvuðssáttmála.

Um so er, at tað fyri tað einstaka arbeiðsfólki ikki er galdandi ein vanlig arbeiðstíð, t.d. orsakað av, at arbeiðið byrjar hvønn dag til ymiska tíð, má samdøgrið byrja frá tí, at arbeiðið veruliga byrjar.

Viðvíkjandi spurninginum um flutningur til og frá arbeiði, skal roknast við í arbeiðstíðina, er hetta ein meting sum má gerast í hvørjum einstøkum føri.

Har sum starvsfólk sambært sáttmála fær løn undir flutningi til og frá arbeiði, og vanlukkutryggingarskip-

amin er galdandi við flutning, har eigur hendan flutningstíð at verða roknað við í arbeiðstíðina.

Viðvíkjandi 2. petti er at viðmerkja, at reglan fult út ásetir, undir hvørjum viðurskiftum hvíldartíðin kann minkast niður í 8 tímar.

Sustatt er ikki møguleiki at minka hvíldartíðina á øðrum økjum, sjálvt um hesi økir kanska í ávísan mun líkjast teimum, sum nevnd eru í 2. petti.

Viðv. § 44:

Ráðið metir tað hava avgerandi týdning, at hendan lógargrein framvegis verður galdandi í Føroyum, hóast grannalond okkara tykjast at leggja minni dent á hesar áseting.

Tá nevnt verður, at halgidagsarbeiði skal vera til samfelagsins fromu ella er neyðugt at varðveita virði, so eigur hetta at vera tikið eftir orðunum, soleiðis at misnýtsla ikki fer fram av hesum undantaksmøguleika.

Viðv. § 45:

Eisini her eigur talan at vera um frávik, sum bert verður gjørt í undantaksføri, og bert tá tað er avgerandi neyðugt.

Tá frávikið verður skrivað í eftirlitsbókina ella innað líknandi skjal, eigur møguleiki eisini at vera fyri at kanna eftir, um misbrúk er farið fram í tí einstaka førinum.

Viðv. § 46:

Í teimum grannalondum, sum hava líknandi lógarreglu, er tað soleiðis, at Arbeiðseftirlitið, áðrenn frávik verður gjørt, letur álitisfólkið á arbeiðsplássinum gera sínar viðmerkingar, og í flestu førum, har frávik verður gjørt, er álitisfólkið og Arbeiðseftirlitið samd.

Viðvíkjandi 2. petti er at viðmerkja, at her er bert talan um einstaka hvíldartíð ella einstakt frísamdøgur, av tí at tá talan er um fleiri hvíldartíðir ella frísamdøgur, har her til, um ikki annað, so munnliga at fáa loyvi í røtta tíð.

Viðvíkjandi 3. petti er at viðmerkja, at hesi frávik kundu hugsast at verið gjørd innanfyri fakøkir, har bæði arbeiðsgevari og arbeiðsfólk, umframt felóg teirra, eru samd um at tørvur kann vera á frávikum.

Viðvíkjandi 4. petti er at viðmerkja, at Landsstýrið, t.d. kann ásetta, at hovuðssáttmáli kann gera frávik frá lógarinnar reglum, og t.d. undir hvørjum treytum hesi frávik kunnu verða gjørd.

Hugsanin við hesari reglu er, at hon kann nýtast í einstøkum fori, har ikki verður metti, at neyðugt er at fáa Arbeiðseftirlitið við í avgerðina.

Viðv. § 47:

Hesi frávik skulu sum orðingin sigur, bert fara fram, har hetta verður hildið at vera neyðugt.

Tá nærri verður kannað eftir, hvørjir persónar skulu vera fevndir av lógarorðingini, má hendan meting gerast útfrá teimum umstøðum, sum eru, m.a. um viðkomandi t.d. hevur ábyrgd av útinnanini av arbeiði við hein leiðis sambandi til hægstu leiðslina, um viðkomandi hevur starvs-setanar og uppsagnarheimildir, um viðkomandi við avtalum, beinleiðis kann binda arbeiðsgevara sín, og um viðkomandi í storri mun kann leggja tilrættis arbeiðstíð sína, uttan at neyðugt er við góðkenning frá hægstu leiðslu arbeiðsgevarans.

Viðv. § 48:

Í samband við tær ásetingar, sum verða framdar við heimild í hesari lógargrein, kann atlit verða tikið til bæði trygd og heilsu hjá starvsfólki og øðrum.

Í samband við ásetingar um avmarkaða arbeiðstíð kann eisini verða nærri ásett, at steðgur skal verða í arbeiðstíðini.

Náttúrligt er, um partarnir á arbeiðsmarknaðinum taka upp spurningin viðvíkjandi løn fyri tey arbeiðsfólk, sum koma undir nærri reglurnar, sum ásettar verða.

Týðningurin av § 47 eigur at verða samanborðin við § 35, og tá tørvurin á ásetingum sambært § 47 verður mettur, kemur tað m.a. at veldast um hvussu nágreiniligar reglur verða ásettar sambært § 35.

Tann avmarkaða arbeiðstíðin vil vanliga bert fevna um tað serliga arbeiði, sum kann verða vandamikið fyri trygd og heilsu.

Kapittul 9: (Børn og ung undir 18 ár).

Viðv. § 49:

Í grannalondum okkara t.d. Danmark og Grønlandi er aldursmarkið 15 ár, men ráðið metir serliga við atliti til fiskivinnuna, at møguleiki eigur at verða fyri ung niður í 14 ára aldursmark at taka lut í t.d. fisknarbeiði, soleiðis sum tað í stóran mun verður gjørt í løtuni.

Ansa eigur tó at verða eftir, at hesin aldurshólkur ikki verður settur til tað tunga og vandamikla arbeiði.

Tá tosað verður um vanligt arbeiði, so er talan um arbeiði í tænastu hjá arbeiðsgevara. t.v.s. t.d. starvspraktikkur verður ikki mettur sum vinnuligt arbeiði.

Við 2 petti er at viðmerkja, at landsstýrið t.d. kann áseta annað aldursmark fyri ávís arbeiði eins og serreglur kunnu ásetast.

Viðvíkjandi 3 petti er at viðmerkja, at í Danmark hevur arbeiðsmálaráðið við heimild í líknandi lógarreglum ásett, at børn undir 10 ár ikki skulu taka lut í slíkum lættari vinnuligum arbeiði.

Viðv. § 50:

Tá talað verður um "í vanligum føruni", so eigur hetta at skiljast soleiðis, at møguleiki er fyri, at ung fólk, sum eru yngri enn 18 ár, kunnu luttaka í yvirtíðararbeiði.
Tað er ein fyritreyt, at hesin møguleiki bert verður nýttur undir serligum viðurskiftum og ikki støðugt og upp í saman.

Tó er tað ikki bert, tá talan er um heilt serstakar umstøður, at hesin aldurshólkur kann luttaka í yvirtíðararbeiði, men kann talan verða um t.d. yvirtíðararbeiði í samband við høgtíðir ella tílíkt.

Annað petti í lógargreinini ásetur størsta tímatalið og avmarkar harvið eisini yvirtímatalið hjá aldurshólkinum.

Hóskandi mat- og hvíldartíðir verður vanliga roknað frá til 2 tímar.

Viðv. § 51:

Tá annað petti nevnir orði "vanliga", so skal hetta skiljast á tann hátt, at frávik bert eiga at verða gjørd í undantaksføri.

Tá samlaða hvíldartíðin skal verða 12 tímar um samdøgri, hevur viðkomandi rett til at møta seinni enn vanligt til arbeiðis, har hann dagin fyri t.d. hevur arbeitt út á kvøldið.

Í Danmark er hvíldartíðin ásett at verða millum kl. 20.00 og kl. 06.00.

Kapittul 10: (læknakanningar v.m.)

Viðv. § 52:

Ráðið metir, at ein fyritreyt fyri besari lógargrein er, at Arbeiðseftirlitið og arbeiðsmedisinarin í stóran mun fáa høvi at gera tilmæli í samband við møguligar ásetingar, sum Føroya Landsstýrið við heimild í hesari lógargrein ásetur.

Náttúrligt hevði eisini verðið, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum, fakfeløgini innan fyri tey ymisku arbeiðsøkini fáa høvi at koma við sínum viðmerkingum, áðrenn endaligu reglurnar verða ásettar.

Sum orðingin sigur, so er tað ein treyt, at tala er um arbeiðsøki, har heilsuvandi kann verða.

Læknakanningar kunnu sjálvsagt eisini fremjast av starvsfólki har viðurskiftir áður kunnu hava ført við sær heilsuvanda, men har besi viðurskifti seinni eru broytt.

Sum dømi hava teir í Danmark nevnt arbeiði við evnimum asbest.

Slíkar læknakanningar kunnu m.a. hava týðning í sambandi við metingina um, hvat arbeiði viðkomandi skal hava framyvir, um so er at viðkomandi hevur verið úti fyri heilsuskaðiligum árini.

Við arbeiðsmedisinskar og arbeiðsheilsufrøðisligar kanningar er at skilja kanningar av tí árini, sum arbeiðsumhvørvið hevur á starvsfólki.

Kapittul 11: (arbeiðsumhvørvisráð).

Viðv. § 53:

Ráðið vil mæla til, at Landsstýrið, har tørvur er á hesum, letur Arbeiðseftirlitið saman við pørtunum á arbeiðsmarknaðinum gera konsekvensútrokningar í sambandi við at nýggjar kunngerðir verða settar í gildi við heimild í hesari lóg.

Ráðið viðmerkir tó, at hesar útrokningar ikki skulu nýtast til at seinka ella forða fyri, at áseting-arnar í lógini verða fylgdar við frammanfyri nevndu kunngerðum.

Sum orðingin vísir, so hevur landsstýrið heimild at áseta nærri reglur fyri virkið ráðsins m.a. hvørjar heimildir ráðið skal hava.

Tað er við hesum ráði, at t.d. partarnir á arbeiðsmarknaðinum fáa møguleika fyri, alt eftir teimum heimildum, sum Landsstýrið gevur ráðnum, at gera sína ávirkan galdandi í spurningum um arbeiðsumhvørvi.

Kapittul 12: (Arbeiðseftirlitið).

Viðv. § 54:

Føroya Landsstýri er hægsti myndugleiki í sambani við avgerðir, sum Arbeiðseftirlitið tekur.

Sambært § 56 kann Landsstýrið geva stjóranum fyri Arbeiðseftirlitinum tær heimildir, sum sambært lógini liggja hjá Landsstýrinum.

Viðv. § 55:

Hendan lógargrein vísir, at virksøki hjá Arbeiðseftirlitinum er sera vitt, og er hetta eisini sam-svarandi lógarreglunum í grannalondum okkara.

Viðvíkjandi 2. pkt. er at viðmerkja, at fyrireikingin av reglum sambært lógini eftir øllum at dømi verður ein týðandi táttur í arbeiðinum hjá eftirlitinum.

Viðv. § 56:

Viðv. § 57:

Ráðið metir, at hægsti umsitingarligi myndugleiki eigur at hava møguleika fyri, um tørvur er á hesum, at leggja ávís arbeiðsøki til aðrar stovnar enn Arbeiðseftirlitið.
Hendan regla er eisini galdandi í m.a. Danmark.

Viðvíkjandi 3. petti kann viðmerkjast, at í Danmark eru við heimild í líknandi lógargrein gjørd kunngerð um gjald í samband við kanning av dampketlum, trýstroyndir av trýstbeholdarum, kanningar av lyftum v.m.

Viðv. § 58:

Hendan reglan snýr seg bert um fráboðanarskyldu í samband við hagfrøðisligar kanningar.

Viðv. § 59:

Hesar heimildir eru náttúrligar og eisini neyðugar, um Arbeiðseftirlitið á fullgóðan hátt skal røkja sínar skyldur.

Viðv. § 60:

Hendan reglan skal skiljast á tann hátt, at Arbeiðseftirlitið eftir tímastøðunum kann banna t.d. arbeiði sum ikki líkar lógarinnar krøv.

Í hesum sambandi verður eisini víst til teir kærumøguleikar og revsifyriskipanir, sum áseettar eru í lógini.

Viðv. § 61.

Ein týðandi táttur í skráseting av ti eftirlitsarbeiði, sum gjørt verður, er eftirlitsbókin, sum umrødd verður í hesari grein.

Viðv. § 62:

Náttúrligt er, at starvsfólkið, sum starvast innan fyri lógarinnar øki eins og øðrir almennir myndugleikar og persónar hava tagnarskyldu.

Viðvíkjandi 2. petti er at viðmerkja, at reglan er neyðug fyri, at starvsfólkið ikki skal halda seg aftur við at senda inn klagu, tá grundarlag er fyri ti.

Viðv. § 63:

Kapittul 13: (Kærur).

Viðv. § 64:

Kærufreistin er í Danmark sett til 4 vikur, meðan hon í Grønlandi er 8 vikur.

Kapittul 14: (kriminalrættsligar fyrlskipanir).

Endamálið við revsifyriskipanum er, sum við flest øllum revsiliðtøkum, tann, at tey fólk, sum á ein hvønn hátt hava við arbeiðsumhvørvisspurningar at gera, tað verði seg sum arbeiðsgevari ella starvsfólk, skulu sígggja tað álvara, sum lóggávuvaldi hevur lagt í hesar reglur, og at ter verða fylgdar.

Eisini skulu hesar revsireglur hjálpa til at halda t.d. arbeiðsgevara frá at royna at spara uppá rakstrarútreiðslur sínar við at slaka við teimum krøvum, sum lógin ásetir.

Viðv. § 65:

Ábyrgdin er subjektiv skilt á tann hátt, at brotini skulu verða framd antin við vilja ella við óansni.

Í Danmark er møguleiki fyri heftirevsing umfram bót.

Viðv. § 66:

Eftir ordingini er her talan um objektiva ábyrgd t.v.s., at ikki er neyðugt at talan er um vilja brot ella brot sum er framt við óansni.

Viðvíkjandi allýsing av "arbeiðsgevari", verður víst til viðmerkingarnar til § 11.

Viðv. § 67:

Í ásetingunum kunnu setast reglur um bæði objektiva og subjektiva ábyrgd.

Viðv. § 68:

Viðv. § 69:

Tá fógarreglan vísir á, at tann sum hevur foreldramyndugleikan skal verða vitandi um, at arbeiði er farið fram, so liggur í hesum eitt krav um, at talan skal verða um vilja brot.

Tað er tó eingin treyt, at tann sum hevur foreldramyndugleikan, beinleiðis hevur lingið persónin undir 18 ár at fremja slíkt arbeiði.

1. viðgerð 16. apríl 1996. Málið verð beint í trimaðarnevndina.

Burturdottið.

86 Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broytiog í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan við seinni broytingum verður stk. 3 í § 5 orðað soleiðis:

"Stk. 3. Fyri vinnurekandi grunnar og tryggingarfeløg, ið fevnd eru av stk. 1, verður skatturin ásettur til 27% av inntøkunum til landskassan og kommun ur."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, men er galdandi frá 1. januar 1995.

Viðmerkingar:

Landsstýrið ynskir við uppskotinum skattliga at líkastilla vinnurekandi grunnar við størri vinnurekandi feløg.

Broytingin hevur við sær, at vinnurekandi grunnar við gildi frá 1. januar 1995 skulu rinda 27% í skatti av skattskyldugu inntøkuni. Grunnarnir verða við hesum síðusettir við vinnurekandi feløg, hvørs partapeningur er 80.000 kr. ella hægri, og tryggingar- og endurtryggingarfeløg.

Um henda broyting ikki verður gjørd, koma vinnurekandi grunnar at gjalda 49% í skatti av skattskyldugu inntøkuni.

Hetta uppskotið hevur við sær, at landskassin væntandi fer at missa skattainntøkur upp á 1-2 mió. kr. árliga.

1. viðgerð 11. apríl 1996. Málið verð beint í fíggjarnevndina, sum 26. apríl 1996 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Føroya Landsstýri tann 25. mars 1996 og verð eftir 1. viðgerð 11. apríl 1996 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið, og undir viðgerðini býtt seg í ein meirluta og ein minnilutu.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Álvur Zachariasen, Finnbogi Ísaksson og Kristian Magnussen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins.

Minnilutin (Jørgen Niclasen, Tórður J. Niclasen og Finnbogi Arge) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins við sama grundgeving sum í lingmáli nr. 83/1995.

2. viðgerð 30. apríl 1996. Atkvøðugreiðslan útsett.

13. mai 1996. Atkvøðugreiðsla. Samtykt við 26-0-0 atkvøðum at beina málið til 3. viðgerð.

14. mai 1995 varð loyvi tingsins fingið at víkja frá tíðarfreistini millum 2. og 3. viðgerð. Samtykt við 29-0-0 atkvøðum.

3. viðgerð 15. mai 1996. Málið endaliga samtykt við 28-0-0 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 85, 28. mai 1996.

F.L. j.nr. 2540-33/95.

87 Broyting í løgtingslóg um ferðslu

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Axel Nolsøe, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu.

§ 1.

Í løgtingslóg um ferðslu, sunb. lógarkunngerð nr. 14 frá 2. mars 1988, sum seinni broytt við løgtingslóg nr. 2 frá 9. januar 1996 verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 14, stk. 3 verður "Politivaldið" broytt til "skrásetingarmyndugleikin".
2) Í § 18, stk. 9 verður sum nýtt 3. pkt. sett: "Meginætlan og reglur gjørdar við heimild í hesum stykki eru undantiknar lýsing."
3) Í § 18 b, stk. 4 og § 18 c, stk. 1, stk. 2 og stk. 5 verður "løgreglan" broytt til "myndugleikin, sum gevur út koyrikortini", og í § 18 c, stk. 5 verður innsett sum nýtt 2. pkt.: "Løgreglan kann vera til hjálpar, við atliti til at taka aftur koyrikort."
4) § 21, stk. 3 verður orðað soleiðis:
   "Stk. 3. Landsstýrið kann ásetta, at koyrikort, sum útgivin eru í Noregi, Íslandi ella í landi, sum er limur í Europeiska Samveldinum, fáa gildi her í landi, eisini eftir, at handhavarin hevur tikið bústað her.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar:

Á fundi 7. februar 1996 samtykti landsstýrið, at umsitingin av motorskrá og koyrikortum verður flutt frá landfútanum til Bileftirlitið.

Samsvarandi hesum hevur landsstýrið dagført lógina í neyðugum vavi.

Harumframt skjýtur landsstýrið upp aðrar broytingar í lógini, sum millum annað viðvíkja meginætlanini fyri koyrilærarar.

Eisini eru reguleringar gjørdar, sum standast av, at Svøriki og Finland eru farin upp í ES.

Um tær umsitingarligu og fíggjarligu avleiðingarnar av broytingunum er at siga, at í samband við yvirtøkuna av motorskránni og koyrikortum, hevur Bileftirlitið yvirtikið eitt starvsfólk frá fútaskrivstovuni. Av tí at

stovnurin einans verður líggjaður við brúkaraggjøldum, komna uppskotnu lógarbroytingarnar unga ávirkan at hava á løgtingsins líggjarlóg.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

Ad § 1, nr. 1. Í galdandi ferðslulóg § 44 er ásett, at nummarspjøldrini á einum aktari í teimum í viðøkunum viðgjørdu førum skulu latast løgregluni. Við í fyriliti at landsstýrið hevur avgjørt, at skráseting av motorakførum, sum eftir galdandi reglum hoyrir undir løgregluni, frá 1. januar 1996 verður flutt til Bileftirlitið, verður skotið upp, at nummarspjøldrini í teimum førum har hetta er ásett, skulu latast til skrásetingarmyndugleikan.

Soleiðis er einki til hindurs í lóggávuni fyri, at myndugleikabroytingin kann gerast fyrisitingarliga.

Ad § 1, nr. 2. Tað verður ikki mett, at tørvur er á at lýsa so rúgvismikið tilfar, sum rættar seg til so fáar borgarar (koyrilærarar). Skotið verður til upp, at meginætlanin og reglur eftir § 18, stk. 9 verða undantiknar lýsing, eins og tað t.d. er galdandi fyri kunngerð um starkfyriskipanirnar um tilgerð og útgerð hjá akførum eftir § 10, stgk. 1 í ferðslulógini.

Ad § 1, nr. 3. Landsstýrið hevur samtykt, at myndugleikan at útskriva koyrikort, ið eftir galdandi reglum hoyrir undir løgregluna, frá 1. januar 1996 verður flutur til Bileftirlitið.

Broytingaruppskotini eru ein avleiðing av hesum, soleiðis serliga at loyvið at taka aftur koyrikortið í teimum førum, har ánarin ikki meira uppfyllir treytirnar at fáa koyrikort, verður latin Bileftirlitinum.

Soleiðis er einki til hindurs í lóggávuni fyri, at myndugleikabroytingin kann gerast fyrisitingarliga.

Ad § 1, nr. 4. Í galdandi ferðslulóg § 21, stk. 3 er ásett, at koyrikort, ið eru tikin í Finlandi, Íslandi, Noreg og Svørki, eru galdandi her á landi eftir nærri áseting landsstýrisins, eisini aftaná at ánarin hevur búsett seg her.

Sambært lógaruppskotinum verður heimild landsstýrisins víðkað til eisini at umfata koyrikort tikin í londum, ið eru limir í europeiska felagsskapinum.

1. viðgerð 16. apríl 1996. Málið verð beint í rettarnevndina, sum 30. apríl 1996 legði fram søtjáandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 25. mars 1996 og varð eftir 1. viðgerð 16. apríl 1996 beint í rettarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og mælir **ein samd nevnd** tinginum til at samtykkja tað.

2. viðgerð 7. mai 1996. Samtykt við 25-0-0 atkvøðum at heina málið til 3. viðgerð.

3. viðgerð 14. mai 1996. Málið endaligt samtykt við 27-0-0 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 59, 20. mai 1996.

F.L. j.nr. 640-3/90.

88 Broyting í arvaavgjaldinum

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í lóg um arvaavgjald.

§ 1.

Í lóg frá 27. mars 1908 um arvaavgjald, sum hon er sett í gildi í Føroyum við kgl. fyriskipan nr. 468 frá 8. november 1921 við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 2, A, verður orðað soleiðis:
"Tá ið arvingarnir eru eftirkomarar ella ættleiðingar: 7½%".
2) § 2, B, verður orðað soleiðis:
"Tá ið arvingarnir eru foreldur ella eftirkomarar teirra, um so er, at tey ikki koma undir litra A: 18%".
3) § 2, C, verður orðað soleiðis:
"Tá ið arvingarnir eru abbar ella ommur arvaleggjarans ella teirra eftirkomarar, um so er, at tey ikki koma undir litra A og litra B: 30%".
4) § 2, D, verður orðað soleiðis:
"Tá ið arvingarnir eru arvingar longur burtur í ættini ella arvurin fer til persónar, ið hann ikki er skyldur við: 40%".
5) Í § 2, seinasta stk., verður "Staten" broytt til: "landið" og "10 pct" broytt til: 40%".
6) § 3, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Arvaavgjald verður bara goldið av arvapørtum upp á kr. 3.000 og hægri".
7) Í § 3, stk. 2 verður "200 kr." broytt til: "kr. 5.000".
8) Í § 3, stk. 3 verður "Ægtefælle og" strikað og "500 kr." broytt til: "10.000 kr.".
9) Sum nýggj § 3, stk. 7 verður innsett:
"Tey, sum nevnd er í § 2 litra A, skulu eisini rinda avgjald upp á 7½% av gávum, sum tey taka ímóti. Avgjald skal tó ikki rindast av árligum upphæddum, sum eru kr. 5.000 ella lægri."
10) Sum nýggj § 3, stk. 8 verður innsett:
"Fráboðan um gávumóttøkuna skal latast Toll- og Skanstovu Føroya í seinasta lagi 15. mars árið eftir tað álmanakkaár, at gávan er móttikin, og fellur til gjaldingar, tá hon verður fráboðað við 14 daga gjaldfreist. Gávumóttakarin hevur skyldu til at rinda avgjaldið. Gávulatarin ábyrgist tó eisini fyri avgjaldinum mótvegis landskassanum."
11) § 43 verður orðað soleiðis:
"Arva- og gávuavgjaldið fer í landskassan."

§ 2

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar:

Í løgtingsfíggjarlógini fyri 1996 er inntøkan á konto 3204: Arvagjøld, sett til 9 mió. kr. Higartil hava árligu inntøkurnar verið umleið 2 mió. kr.

Galdandi reglur um arvaavgjøld eru lóg frá 27. mars 1908, sum hon er sett í gildi í Føroyum við kgl. fyriskipan nr. 468 frá 8. november 1921 við seinni broytingum. Prosentsatsirnir og krónuupphæddirnar, sum arvaavgjøldini verða roknað eftir, hava verið óbroytt síðani lógin upprunaliga varð sett í gildi.

Í yvirlitinum niðanfyri verða víst verandi gjøld og gjøldini, sum skotin verða upp:

Arvaflokkur:	**Verandi gjøld:**	**Uppskot:**
A: Eftirkomarar	1% - 3%	7½%
B: Foreldur og teirra eftirkomarar	4% - 6%	18%
C: Abbar, ommur og teirra eftirkomarar	7% - 9%	30%
D: Arvingar longur burtur í ætt o.o.	10% - 12%	40%
E: Stovnar, feløg o.t.	10%	40%

Eftir broytingunum 6) - 8) verða minstu upphæddirnar, sum arvaavgjald verður roknað av, hækkaðar.

Sambært hesum uppskoti sleppa eftirsitandi hjúnarfelagar framyvir fullkomiligu undan at rinda avgjald av arvi, sum deyði hjúnarfelagin leggur eftir seg. Sama er galdandi fyri gávur, sum latnar verða millum hjún.

Hinvegin hevur hetta uppskotið við sær, at avgjald framyvir verður lagt á gávur, sum latnar verða eftirkomarum og ættleiðingum. Gávur, sum børn lata t.d. foreldrum, koma hinvegin ikki undir hesa reglu, tí talan er einans um tey, sum koma undir arvaklassa A. Avgjaldsupphæddin er tann sama sum arvaavgjaldið, 7½%. Gávuavgjald verður tó ikki roknað av árligum gávum upp á kr. 5.000 ella lægri. Avgjaldsskyldan liggur á móttakaranum, men latarin ábyrgist solidariski fyri gjaldinum mótvegis landskassanum. Gávuavgjaldið er gjaldkomið, tá gávan verður fráboðað Toll- og Skattstovu Føroya í seinasta lagi 15. mars árið eftir tað almanakkaár, hon er latin í.

Eftir § 43 í lógini fer nakað minni enn helvtin av arvaavgjaldinum í statskassan og testin í landskassan. Eftir uppskotinum verður hetta broytt soleiðis, at arva- og gávuavgjaldið fer alt í landskassan. Broytingarnar eftir hesum uppskoti verða ikki metlar at geva tu upphædd, ið er samtykt á løgtingsfíggjarlógini fyri 1996, tí prosentsatsirnir í arvaflokkunum A og B eru lægri enn ætlanin var, tá fíggjarlógaruppskotið varð gjørt.

1. viðgerð 11. apríl 1996. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 7. mai 1996 legði fram saljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 25. mars 1996 og eftir 1. viðgerð 11. apríl 1996 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið. Undir viðgerðini hevur nevndin hildið fund við Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, umboð fyri Toll- og Skattstovuna, umboð fyri Fíggjar- og Búskapardeildina í landsstýrinum.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Ein meiriluti (Vilhelm Johannesen, Kristian Magnussen, Álvur Zachariasen og Finnbogi Ísakson) tekur undir við málinum og mæla løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Ein minniluti (Anfinn Kallsberg, Tórður J. Niclasen og Finnbogi Arge) tekur ikki undir við málinum og setir eínki uppskot fram.

2. viðgerð 9. mai 1996. Uppskotið fekk 5-1-20 atkvøður og fall.

F.L. j.nr. 2581-1/92.

89 Broyting í løgtingslóg um búskaparráð

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um búskaparráð

§ 1.

Í Løgtingslóg nr. 120 frá 12. juli 1995 um búskaparráð verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 2 verður orðað soleiðis:
"§ 2. Ráðið hevur 7 limir. Landsstýrið setur limirnar eftir tilmæli frá setursráðnum á Fróðskaparsetri Føroya."
2) § 2a verður orðað soleiðis:
"§ 2a. Ráðið skipar seg við formanni. Formaðurin og tveir av hinum limunum skulu hava útbúgving sum búskaparfrøðingar."
3) § 2b verður orðað soleiðis:
"§ 2 b. Hinir 4 limirnir skulu hava serkunnleika innan umráðandi øki í búskapinum."
4) § 3 verður orðað soleiðis:
"§ 3. Búskaparráðið kemur saman minst tvær ferðir um árið eftir avgerð formansins ella eftir óheitan frá 4 limum í ráðnum."

§ 2.

Hetta lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og verður samstundis danski teksturin í lógini avtikin.

Viðmerkingar:

Síðan nýggja lógin um búskaparráð varð samtykt seinasta vár, hevur verið arbeitt við at finna limir til nýggja ráðið.

Hetta hevur tó gingist sera illa í hond, tí lógin fekk, soleiðis sum hon endaliga varð samtykt, eina rettiliga avmarkandi orðing, um í hvønn mun limirnir skulu vera óheftir. Grein 2 a) í lógini hevur hesa orðing:
"Ráðið skipar seg við formanni. Formaðurin og tveir av hinum limunum skulu hava útbúgving sum búskaparfrøðingar. Hesir tríggir limirnir mugu ikki hava leiðandi støv innan miðfyrisitingina og mugu ikki umboða serávugamál í dagliga starvi sínum."

Royndirnar hetta árið vísa, at tað er sera trupult at finna fólk, sum dagliga arbeiða við búskapi, utan at hesi á onkran hátt eru knýtt at antin landsstýrinum ella onkrum privatum ávugamálum.

Í øðrum londum er vanligt at manna búskaparráðini við búskaparfrøðingum frá teimum hægri lærustovnunum. T.d. er tað danska búskaparráðið mannað av trimum professarum frá Århus og Keypmannahavn. Hesin møguleikin er ikki til staðar í Føroyum, tí vit ikki hava búskaparfrøðingar, ið bert hava til arbeiðis at undirvísa um búskap á hægri lærustovnum.

Landsstýrið heldur, at fyri at búskaparráðið skal hava trúvirði millum almenningin, er bæði neyðugt at limirnir hava ávísar arbeiðsroyndir innan búskap, og samstundis eru rímiliga óheftir av serávugamálum. Fyri at tryggja at limirnir eru rímiliga óheftir (frá t.d. politiskum ella vinnuligum ávugamálum), er uppgávan at finna fólk til búskaparráðið løgd til Fróðskaparsetrið. Landsstýrið heldur, at hetta skipan er nóg góð trygd fyri, at limirnir, ið skotnir vera upp til búskaparráðið, eru bæði fakligt skikkaðir og samstundis rímiliga óheftir til at taka við hesi ábyrgd.

Landsstýrið skjýtur somuleiðis upp, at ráðið verður styrkt við at hækka limatalið úr 5 uppí 7 limir. Av hesum 7 skulu 3 vera búskaparfrøðingar, og hinir 4 skulu vera fólk við serkunnleika innan serlig øki í búskapinum. T.d. innan fiskivinnu, peningastovnsvirksemi, handilsvinnu ella arbeiðsmarknaðarviðurskiftir. Hetta kann gerast innan fyri verandi játtan.

Landsstýrið ynskir við hesum at fáa í lag eitt samstarv millum fólk við góðum ástøðiligum kunnleika um búskap og fólk við praktiskum royndum frá ymsum sektorum í búskapinum.

Ynski landsstýrisins við uppskotinum er at fáa eitt búskaparráð, sum kann hava trúvirði, og sum er lørt fyri bæði at geva ríntiliga óhefta og samstundis fakliga kvalifiseraða ráðgeving til almenningin um búskapar viðurskifti.

1. viðgerð 12. apríl 1996. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 29. apríl 1996 legði fram soljóðandi

Á l i t

Málið er lagt fram av Føroya Landsstýri tann 25. mars 1996 og varð eftir 1. viðgerð 12. apríl 1996 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið, og undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meirluta og ein minniluta.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Álvur Zachariasen, Finnbogi Ísakson, Kristian Magnussen og Finnbogi Arge) tekur undir við uppskoti landsstýrisins.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg, og Tordur J.Nielasen) vísir á, at teir mæltu til eina aðra loysn, tá lógin um búskaparáð varð samtykt í løgtinginum fyri einum ári síðani (sí løgtingsmál nr. 167/1994). Har varð víst á, at lógin um búskaparráð, sum skal verða óheft, bæði fyrisitingarliga og vinnuliga, fór at vera sera kostnaðarmikil, av tí at alt arbeiði skuldi gerast frá botni av, og tí kom nógv dupultarbeiði at verða gjørt.
Tað vísir seg nú, at vit fingu rætt. Tí er fyriliggjandi broytingaruppskot ein roynd at sminka eina ónýtiliga loysn á hesum týdningarmikla máli.

2. viðgerð 2. mai 1996. Samtykt við 21-5-0 atkvøðum at beina málið til 3. viðgerð.

3. viðgerð 8. mai 1996. Málið endaliga samtykt við 19-4-0 atkvøðum.
Løgtingslóg nr. 74, 20. mai 1996.

F.L. j.nr. 2513-4/94.

90 Broyting í løgtingslóg um stuðul til nýggjar vinnur

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Axel Nolsøe, landsstýrismaður, fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um stuðul til nýggjar vinnur.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 17 frá 1. februar 1995 um stuðul til nýggjar vinnur, sum broytt við løgtingslóg nr. 91 frá 13. juni 1995, verður § 1, stk. 3 orðað soleiðis:
"Stk. 3. Einaferð hvønn mánað ger virkið upp tær lønir, ið eru goldnar í samband við nýggja vinnu undanfarna mánaðin, og sum koma undir ásetingarnar í stk. 1. Landsstýrið gevur síðani Foroya Gjaldstovu ávísingat flyta virkinum studningin, ið er tað í stk. 4 ásetta prosentið av lønarútgjaldingunum."

§ 2.

Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar:

Í løgtingslóg nr. 17 frá 1. februar 1995 um stuðul til nýggjar vinnur, § 1, stk. 3 verður sagt, at Toll- og Skattstovan skal gera upp tær lønarútgjaldingar, sum eru til tu nýggju vinnuna. Hóast hetta, er onnur mannagongd ásett í § 6 í kunngerð nr. 44 frá 21. apríl 1995 um umsiting og eftirlit í samband við stuðul til nýggjar vinnur. Har verður sagt, at virkið skal gera eina uppgerð yvir útgoldnu lønirnar, og at løggildur grannskoðari skal váttta, at uppgjørdu lønirnar umboða arbeiði fyri tað, sum góðkent er sum nýggj vinna.

Broytingar í løgtingslógini eru upprunin til vantandi saman-hangin. Lógin var av fyrstan tíð ætlað sum ein FAS-líknandi skipan, og tí var tað natúrligt, at Toll- og Skattstovan gjørdi upp lønarútgjaldingarnar. Men undir viðgerðini í løgtinginum varð lógin broytt til eina studningslóg, og tí varð í kunngerðini ásett, at løggildur grannskoðari váttar, at bert løn til nýggjar vinnur fær endurgjald. Í sambund við studningin til vinnur er vanlig mannagongd, at landsstýrið eftirkannar og ávísir upphæddina, og Toll og Skattstovan hevur eisini boðað frá, at hon ikki hevur orku at átaka sær hesa uppgávu.

Hóast hesi ívamál hevur landsstýrið givið gjaldsordnar síðani september 1995, tí nett hevur verið, at umsøkjarin hevur eitt rættarkrav uppá at fáa studningin.

Tí verður uppskot lagt fram um at broyta § 1, stk. 3 samsvarandi hesum, so uppgerðin yvir útgoldnar lønir verður send landsstýrinum til víðari avgreiðslu. Í § 1, stk. 5 er ásett, at landsstýrið kann seta neyvari reglur um umsiting og eftirlit viðvíkjandi studningi.

1. viðgerð 16. apríl 1996. Málið varð beint í vinnunevndina, sum 7. mai 1996 legði fram soljóðandi

Á 111

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 25. mars 1996 og eftir 1. viðgerð 16. apríl 1996 beint í vinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meirilutta og ein minniluta.

Meirilutin (Henrik Old, Iákup Joensen, Óli Jacobsen, Álvur Zachariasen, Heini O. Heinesen og Lasse Klein) tekur undir við málinum og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg) vísir á álit í løgtingsmáli nr. 84/1995: Løgtingslóg um stuðul til menning av fiskivinnu í landi. Niðurstøðan er, at fyriliggjandi uppskot bert er lappari uppá eina lappaloysn.

2. viðgerð 9. mai 1996. Samtykt við 23-0-0 atkvøðum at beina málið til 3. viðgerð.

3. viðgerð 14. mai 1996. Málið endaliga samtykt við 22-3-4 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 60, 20. mai 1996.

F.L. j.nr. 1334-5/93.

91 Broyting í løgtingslóg um gjøld o.l. fyri innkrevjing av falnari skuld til landskassan

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um gjøld o.l. fyri innkrevjing av falnari skuld til landskassan.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 93 frá 11. mai 1993 um gjøld o.l. fyri innkrevjing av falnari skuld til landskassan verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1 verður sum stk. 2 sett:
"Stk. 2. Føroya Gjaldstova fremur panting fyri gjøld eftir stk. 1 eftir reglunum fyri innkrevjing av skattum og avgjøldum."
2) Í § 1 verður sum stk. 3 sett:
"Stk. 3. Føroya Gjaldstova kann eftirhalda í A inntøku skuldarans eftir reglunum fyri eftirhald í § 136 í samlíðarskattalógini."
3) Í § 1 verður sum stk. 4 sett:
"Stk. 4. Føroya Gjaldstova kann í serligum førum eftirgeva gjøld eftir hesi lóg."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar:

Gjaldstovan hevur innført eina nýggja innkrevjingarskipan á heysti 1995, sum skal verða grundarlagið undir eini samskipan av almennu innkrevjingini. Henda formliga broyting er ein liður í hesi samskipan.

Lógin er ikki galdandi fyri avgjøld (pantigjøld), men bert gjøld, sum hava sín uppruna í útreiðslum, sum standast av útskriftum í sambend við innkrevjingararbeiðið á Gjaldstovuni.

Fyri at staðfesta, at tað er Føroya Gjaldstova, sum hevur heimild at panta og eftirhalda í A-inntøku fyri eftirstøður eftir hesi lóg, verður mett, at neyðugt er at nevna tað í lógini.

Neyðugt er eisini, at Gjaldstovan hevur heimild at eftirgeva hesi gjøld, tí eins lætt tað er at álíknað slík krøv, eigur tað at vera at strika tey. Eftirgevingin tekur tó støði í eini málsviðgerð, og dømi uppá hvørjum tey kunnu strikast eru:

1. Um viðkomandi ikki hevur aðra skuld enn gjaldið eftir hesi lóg.
2. Um gjøld eru tilskrivað juridiskum persónum, sum eru óvirknir.
3. Um skuldarin er fluttur av landinum.

1. viðgerð 12. apríl 1996. Málið varð beint í rettarnevndina, sum 8. mai 1996 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 25. mars 1996 og eftir 1. viðgerð tann 12. apríl 1996 beint í rettarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og kann staðfesta, at talan er um eina útbygging av verandi lóggávu um gjøld, sum beinleiðis eru tengd at innkrevjingararbeiðinum á Føroya Gjaldstovu.

Talan er einans um gjøld, sum hava sín uppruna í útreiðslum, sum standast av útskriftum í samband við innkrevjingararbeiði á Gjaldstovuni.

Skotið verður upp at geva Føroya Gjaldstovu eina sertaka heimild til at panta og eftirhalda í A-inntøku eftir hesi lóg, og um neyðugt eftirgeva hesi somu gjøld, um tørvur er á hesum.

Nevndin hevur býtt seg í ein **meirluta** og ein **minnluta**.

Meirlutin (Bjørn á Heygum, Marita Petersen, Lasse Klein, Sune Jacobsen og Ingeborg Vinther) hevur hesar viðmerkingar:

Í galdandi lóggávu stendur einki um nakra tílíka heimild, og ivasamt er, um Føroya Gjaldstova kann nýta vanligu innheintingarreglurnar í hesum serstaka føri.

Neyðugt er tískil at fáa greiðu á hesum viðurskiftum við eini formligari lógarbroyting.

Meirlutin í nevndini er sammdur um, at tað er umráðandi, at tað altfð er greiðliga tilskilað í lógini, hvør tann stovnur er, sum hevur myndugleikan til at krevja inn og eftirgeva almenn gjøld.

Tað hevur somuleiðis alstóran týdning, at hetta týðandi starv kann fara fram undir skipaðum viðurskiftum, soleiðis at innkrevjingarmyndugleikin kennir sín rætt og sína ábyrgd mótvegis tí einstaka.

Vísandi til frammanfyristandandi kann ein meirluti í nevndini sostatt taka undir við, at tær í uppskoti landsstýrisins tilskilaðu broytingar í lóg um gjøld fyri innkrevjing av falnari skuld til landskassan verða framdar.

Ein **meirluti** í rættarnevndini (Bjørn á Heygum, Marita Petersen, Lasse Klein, Sune Jacobsen og Ingeborg Vinther) mælir við hesum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Ein **minnluti** í rættarnevndin (Jógvan á Lakjuni) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins og setir einki uppskot fram.

2. viðgerð 10. mai 1996. §§ 1 og 2 samtyktar við 14-1-3 atkvøðum. Samtykt við 14-1-3 at beina málið til 3. viðgerð.

3. viðgerð 15. mai 1996. Lógin sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 17-1-8 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 76, 20. mai 1996.

F.L. j. nr. 430-14/93.

92 Broyting í lóg um tann europeiskan mannarættindasáttmálan

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, vegna løgmann fram soljóðandi

Uppskot

til

ríkislógartilmæli.

Hennara hátign drotningini verður mælt til, við heimild í § 5 í lóg nr. 285 frá 29. apríl 1992 um tann europeiska mannarættindasáttmálan at seta broyting í lógini í gildi fyri Føroyar við hesum orðaljóði:

Broyting í lóg um tann europeiska mannarættindasáttmálan.

§ 1.

Í lóg nr. 285 frá 29. apríl 1992 um tann europeiska mannarættindasáttmálan verður gjørd henda broyting:

Í § 1, stk. 1, nr. 1 verður eftir litra d sett:

"e) Protokoll nr. 9 frá 6. november 1990 til sáttmálan um vernd av mannarættindum og grundleggjandi friheitsrættindum.

f) Protokoll nr. 10 frá 25. mars 1992 til sáttmálan um vernd av mannarættindum og grundleggjandi friheitsrættindum.

g) Protokoll nr. 11 frá 11. mai 1994 til sáttmálan um vernd av mannarættindum og grundleggjandi friheitsrættindum, ið umskipar ta eftirlitsskipan, ið sáttmálin hevur sett á stovn."

§ 2.

Løgmálaráðharrin ásetir nær lógin fær gildi og kann seta § 1, stk. 1, nr. 1, litra e, litra f og litra g í lóg um tann europeiska mannarættindasáttmálan, soleiðis sum hann er orðaður í § 1, nr. 1, í gildi hvør sær.

Stk. 2. Tá sett verður í gildi § 1, stk. 1, nr. 1, litra g, í lóg um tann europeiska mannarættindarátmálan, soleiðis sum orðað í § 1, nr. 1, kann løgmálaráðharrin seta úr gildi § 1, stk. 1, nr. 1, litra a og litra e, í lóg um tann europeiska mannarættindasáttmálan sum orðað í hesi lóg.

Stk. 3. Í samband við ígildissetan eftir stk. 2, kann løgmálaráðharrin broyta stavmerkingina í § 1, stk. 1, nr. 1 í lóg um tann europeiska mannarættindasáttmálan, sum orðað við hesi lóg.

Stk. 4. Í samband við ígildissetan eftir stk. 1-3 ásetir løgmálaráðharrin innihaldið av skjølunum til lóg um tann europeiska mannarættindasáttmálan.

Det indstilles til hendes majestæt dronningen, med hjemmel i § 5 i lov nr. 285 af 29. april 1992 om Den Europæiske Menneskerettighedskonvention at sætte ændring af loven i kraft for Færøerne i følgende skikkelse:

Ændring af lov om Den Europæiske Menneskerettighedskonvention.

§ 1.

I lov nr. 285 af 29. april 1992 om Den Europæiske Menneskerettighedskonvention foretages følgende ændring:

I § 1, nr. 1, indsættes efter litra d:

"e) Protokol nr. 9 af 6. november 1990 til Konventionen til Beskyttelse af Menneskerettigheder og Grundlæggende Frihedsrettigheder.

f) Protokol nr. 10 af 25. marts 1992 til Konventionen til Beskyttelse af Menneskerettigheder og Grundlæggende Frihedsrettigheder.

g) Protokol nr. 11 af 11. maj 1994 til Konventionen til Beskyttelse af Menneskerettigheder og Grundlæggende Frihedsrettigheder, der omstrukturerer det kontrolsystem, som konventionen har etableret."

§ 2.

Justitsministeren fastsætter tidspunktet for lovens ikrafttræden og kan sætte § 1, stk. 1, nr. 1, litra e, litra f og litra g, i lov om Den Europæiske Menneskerettighedskonvention, som affattet ved § 1, nr. 1 i kraft enkeltvis.

Stk. 2. Ved ikraftsættelsen af § 1, stk. 1, nr. 1, litra g, i lov om Den Europæiske Menneskerettighedskonvention, som affattet ved § 1, nr. 1, kan Justitsministeren ophæve § 1, stk. 1, nr. 1, litra a og litra e, i lov om Den Europæiske Menneskerettighedskonvention som affattet ved denne lov.

Stk. 3. Ved ikraftsættelse efter stk. 2 kan Justitsministeren ændre litreringen i § 1, stk. 1, nr. 1, i lov om Den Europæiske Menneskerettighedskonvention, som affattet ved denne lov.

Stk. 4. Ved ikraftsættelse efter stk. 1-3 fastsætter Justitsministeren indholdet af bilagene til lov om Den Europæiske Menneskerettighedskonvention.

Viðmerkingar:

Landsstýrið hevur fingið fyrispurning frá ríkisumboðinum, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at lóg nr. 1080 frá 20. desember 1995 um broyting í europiska mannarættindasáttmálanum verður lýst at galda í Føroyum.

Løgtingið samtykti í tingmáli nr. 12/1994 at høvuðslógin nr. 285 frá 29. apríl 1992 um tann europeiska mannarættindasáttmálan varð lýst at galda í Føroyum.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

Ad § 1. Eftir lógarbroytingina verða uppískoytisprotukollirnar til mannarættindasáttmálan nr. 9, 10 og 11 tiknar við í lógina.

Eftir protokoll nr. 9 verður sáttmálin broyttur soleiðis, at ikki bara statir kunnu leggja mál fyri mannarættindadómstólin, men eisini einstaklingar, privat felløg og hópar av einstaklingum.

Eftir protokoll nr. 10 verður gjørd tann broyting, at ráðharranevndin kann taka avgerð við vanligum meirluta, móti áður við 2/3 í meiriluta.

Eftir protokoll nr. 11 verur bygnaðurin hjá nevnd og dómstóli broytt, av tí at talið av felløgum og talið av limalondum er nógv økt.

Ad § 2. Av tí at allar 3 protokollirnar um broyting í sáttmálanum ikki eru komnar í gildi enn, fær løgmálaráðharrin heimild til at seta lógina í gildi í pørtum ella í eini heild.

Broytingin fører ikki við sær eyka arbeiði ella eyka kostnað fyri landsstýrið.

1. viðgerð 17. apríl 1996. Málið varð beint í uttanlandsnevndina, sum 8. mai 1996 legði fram saljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 25. mars 1996 og eftir 1. viðgerð 17. apríl 1996 beint í uttanlandsnevndina.

Uttanlandsnevndin hevur viðgjørt málið, og heitir **ein samd nevnd** á løgtingið at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 10. mai 1996. Samtykt við 21-0-0 atkvøðum at beina málið til 3. viðgerð.

3. viðgerð 15. mai 1996. Málið endaliga samtykt við 26-0-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 65-1/90.

93 Løgtingslóg um avtøku av landskassagrunnum.

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um avtøku av landskassagrunnum.

§ 1.Niðanfyri nevndu grunnar í landskassaroknskapinum verða avtiknir, og saldoin verður flutt til kapitalkonto landskassans. Ognir grunnanna, fróknað útlán hjá grunnum verður ogn landskassans. Landskassin yvirtekur tær skyldur, ið áliggja teim avtiknu grunnunum. Tó verða ogn og skuld hjá grunninum "Jarðarbókur oa." flutt Mentunargrunninum, og ogn og skuld hjá grunninum "Útgáva av Føroysk-Donsku Orðabókini" verða flutt sjálvstøðuga grunninum "Orðabókagrunnurin".

Niðanfyristandandi internu grunnar verða avtiknir:
1. Byggi- og rakstrargunnur Postverksins
2. Grunnur til nýtt havransóknarskip
3. Grunnur til nýtt sjúdeikarhús
4. Byggigrunnur strandferðslumar
5. Yvirtøku av sermálum
6. Grunnur Studningur til lærlingar
7. Grunnur SU lærlingar
8. Grunnur til nýtt vaktarskip
9. Bygging av Heilsufrøðiligari starvsstovu
10. Bygging av skjalasavni
11. Grunnur til kirkju í Keypmannahavn.

Fylgjandi eksternu grunnar verða avtiknir:
12. Útgáva av Føroysk-Donsku orðabókini
13. Jarðarbøkur o.a.
14. Grunnur ætlaður brekaðum
15. Menningarhjálp
16. Trygdargrunnur Alivinnunnar

§ 2. Løgtingslóg nr. 56 frá 12. mai 1980 um keyp av royndar-og rannsóknarskipi, verður avtikin.
§ 3. Løgtingslóg um nr 49 frá 15. juni 1950 um føroyskan happadrátt, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 68 frá 12. juni 1990, verður orðað: § 1. f) Yvirskotið av happadráttinum fer í landskassan.

§ 4. Løgtingslóg nr. 33 frá 27.mars 1992 um avtøku av landskassagrunnum verður avtikin.

§ 5. Samstundis fer higartil galdandi danski lógarteksturin fyri løgtingslóg nr. 49 frá 15. juni 1950 um føroyskan happadrátt við seinni broytingum, úr gildi.

§ 6.Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1996.

ALMENNAR VIÐMERKINGAR

Løgtingið samtykti við løgtingslóg nr. 33 frá 27. mars 1992 um avtøku av landskassagrunnum, at avtaka flestu grunnarnar (80), meðan nakrir vórðu umskipaðir til eksternar grunnar (11). Ognir grunnanna gjørdust ogn landskassans, meðan tær skyldur, ið lógu á grunnunum vóru yvirtiknar av landskassanum.

Endamálið hjá landsstýrinum at leggja fyrra uppskotið um avtøku av landskassagrunnum fyri løgtingið var m.a. fyri at geva eina betri heildarmynd av, hvussu stórt virksemi landskassans var einstøku fíggjarárini. Trupulleikin við at máta virksemi landskassans t.d. eitt ávíst fíggjarár, var, at grunnsjáttanirnar kundu verða játtaðar frá ártum frammanundan og tí sást ein stórur partur av virksemi landskassans ikki á fíggjarlógini. Sonuleiðis vóru týðandi rakstrarútreiðslur framdar í grunnum og sóust sostatt ikki í fíggjarlógini. Í nøkrum førum vóru stór yvirtrekk í grunnum. Stór nýtsla kundi sostatt verða framd úr landskassanum uttan at hetta sást í fíggjarlóg ella høvuðsyvirlitunum í landskassaroknskapinum.

Landsstýrið legði í 1991 um til eina skipan, har nestan allar útreiðslur standa á fíggjarlógini, uttan mun til um tær eru fíggjaðar við skatti, láni ella grunni.
Tær rakstrarútreiðslur sum áður vóru framdar yvir grunn eru nú settar beinleiðis á fíggjarlógina. Tær fløgur, sum grunnarnir eru ætlaðir til, nýtast ikki at falla burtur, tí um politiskur áhugi og vilji er at fremja hesar fløgur, verða tær settar á fløguætlanina í samband við framløguna av fíggjarlógini.

Um so er, at peningur er settur av í grunn til ávíst endamál, so ávirkar hetta kortini ikki raðfestingina hjá landsstýrinum, tá íløguætlanin verður gjørd. Grunnarnir hava sostatt ikki nakra meining undir verandi skipan, tí heimild til nýtslu kann bert fáast til vega á árligu fíggjarlógunum. Landsstýrið heldur, at raðfestingin av ynsum íløgum bert eigur at vera grundað á, um íløgurnar tæna týðandi samfelagsendamálum, soleiðis sum landsstýrið til eina og hvørja tíð heldur vera rættast.

Um so er, at landsstýrið ynskir at stuðla ella gera íløgur, verður hetta at gjørt við fíggjarlóg og teimum hartil hoyrandi játtanarsløgum. Frá 1997 at roknað vera játtanarsløgini 6 í tali, og innan hesi játtanarsløg er møguleiki at stuðla og gera íløgur, eisini tær, ið eru kostnaðarmiklar og sum ganga yvir longri tíðarskeið.
Annars kann hetta lógaruppskotið metast sum framhald av tí arbeiði, sum byrjaði í 1992. Uppskotið hevur við sær, at landsroknskapurin, fíggjarlógin og gjaldførisyvirlit landskassans gerast greiðari, samstundis sum fíggjarstýring landsstýrisins og løgtingsins verður betri.

Í fyriliggjandi uppskoti er talan um at avtaka 16 internar- og 5 eksternar grunnar. Í niðanfyri nevnda yvirliti verður vist á nøkur viðurskifti, sum eru av týdningi í sambandi við avtøku av grunnunum. Skotið verður m.a. upp at leggja avtiknar grunnar saman við grunnar, sum hava sama- ella líknandi endamál, somuleiðis sum skotið verður upp at flyta virksemið og innistandandi pening yvir í privatar grunnar.

Fíggjarligar avleiðingar:
Uppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar, men er bert ein roknskapartekník broyting.

Fyrisitingarligar avleiðingar:
Broytingin ger, at lættari verður at síggja, hvussu støða landskassans er, og lættir nakað um tað um-sitingarliga arbeiðið.

Grunnar, ið verða avtiknir.

Internir
1. Byggi- og rakstrargrunnur postverksins..
Grunnurin fevnir bert um eginpening Postverksins og hevur einki sjálvstøðugt endamál.
2. Grunnur til nýtt havrannsóknarskip.
Landsstýrið kann seta pening av á íløgupartinum á fíggjarlógini um landsstýrið ynskir at keypa ella byggja nýtt havrannsóknarskip.
3. Grunnur til nýtt sjónleikarhús.
Landsstýrið kann seta pening av á fíggjarlógini um landsstýrið ynskir at stuðla bygging av sjónleikarhúsi.
4. Byggigrunnur strandferðslunnar.
Landsstýrið kann seta pening av á fíggjarlógini um_
5.Grunnur yvirtøka av sermálum.
Landsstýrið kann seta pening av á fíggjarlógini um peningur skal nýtast til arbeiði í samband við yvirtøku av sermálum.
1. Grunnur studningur til lærlingar.
Landsstýrið kann seta pening á nýtt rakstrarstað um landsstýrið ynskir at veita studning til lærlingar.
1. Grunnur SU til lærlingar.
Landsstýrið kann seta pening á nýtt rakstrarstað um landsstýrið ynskir at veita SU til lærlingar.
1. Grunnur til nýtt vaktarskip.
Landsstýrið kann seta pening av á íløgupartinum á fíggjarlógini um landsstýrið ynskir at keypa ella byggja nýtt vaktarskip.
9. Bygging av heilsufrøðiligari starvsstovu.
Landsstýrið kann seta pening av á íløgupartinum á fíggjarlógini um landsstýrið ynskir at gera nýggjan bygning til heilsufrøðiligu starvsstovuna.
1. Bygging av skjalasavni.
Landsstýrið kann seta pening av á íløgupartinum á fíggjarlógini um landsstýrið ynskir at gera nýggjan bygning til skjalasavn.
11. Grunnur til kirkju í Keypmannahavn.

Landsstýrið kann seta pening av á fløgupartinum á fíggjarlógini um landsstýrið ynskir at byggja nýggja føroyska kirkju í Keypmannahavn.

Eksternir

1. Útgáva av Føroysk-Danskari Orðabók.

Annar sjálvstøðugur grunnur, "Orðabókagrunnurin", virkar fyri sama endamáli. Fæið í grunninum "Útgáva av Føroysk-Danskari Orðabók" verður flutt "Orðabókagrunninum".

1. Jarðarbøkur o.a.

Mentunargrunnurin fær fæið í grunninum "Jarðarbøkur", og skal framyvir røkja hesa útgávuuppgávu undfram lar hann annars røkir.

1. Grunnur ætlaður brekaðum.

Landsstýrið kann gera nýtt rakstrarøstað á fíggjarlógini við sama endamáli.

1. Menningarhjálp.

Landsstýrið kann gera nýtt rakstrarstað á fíggjarlógini við sama endamáli.

16. Trygdargrunnur alivinnunar.

Annar eksternur grunnur er gjørdur til endamálið, ið eitur endurgjaldsgrunnur alivinnunar. Ætlanin er at bæði vinnan og landskassin skulu gjalda inn til grunnin. Landskassin skal væntandi gjalda um 2,8 mió. kr. til grunnin komandi 3 árini.

Grunnar, ið verða varðveittir.

Nakrir grunnar verða varðveittir. Orsøkin er, at endamál best verður røkt undir einari grunnsskipan. Tíd, tí virksemið ikki fevnir um eitt ávíst fíggjatár. Játtan verður latin úr hesum grunnum til ymisk prosjekt í árinum, meðan tað er óvist nær prosjektið fer í gongd og nær peningur fellur til gjaldingar. Ofta fellur peningurin ikki til gjaldingar fyrr enn t.d. eitt ár aftaná hann er játtaður.

Landsstýrið metir tí, at endamálið hjá hesum grunnum virkar best fíggjarliga við einari skipan við grunnum og ikki sum eitt rakstrarstað við vanligari rakstrar- ella fløgujáttan. T.v.s. grunnarnir kunnu uppsamla pening fyri síðan at fara undir eitt projekt, sum ikki nýtist at fylgja einum ávísum fíggjarári.

Internir grunnar:

1. Apoteksgrunnurin

Landsstýrið ætlar ikki at avlaka Apoteksgrunnin, orsakað av at almanna- og heilsudeild landsstýrisins júst er við at gera nýggja lóggávu fyri apoteksverkið

2. Úthúgvingargrunnurin

Grunnurin kann møguliga avtakast, men hetta krevur dygga fyrireiking. Studulsstovnurin stendur fyri innkrevjingini av lestrarlánunum, og grunnurin virkar annars væl.

3. Umvælingarstudningur til friðað hús. Viðlíkahaldsarbeiðir fyri friðað hús vara ofta meir enn eitt ár, og tí er ynskiligt at varðveita henda grunn.

Eksternir grunnar:

4. Grunnurin Kirkjubønúrurin

Grunnurin er ein eksternur grunnur, ið er stovnaður við privatum kapitali. Landsstýrið ynskir at varðveita henda bygnað.

5. Grunnur ferðavinnunnar

Grunnurin er eksternur og arbeiðir eftir endamálinum.

6. Ídnaðarfremjandi endamál. Grunnurin hevur ofta verkætlanir, sum fevna yvir meir enn eitt ár, og virkar tí best sum grunnur.

7. Mentunargrunnurin. Útgávuvirksemi grunsins fevnir ofta yvir meir enn eitt ár, og verður tí best røkt av einum grunni.

Allýsing av einum internum grunni

Ein internur grunnur hevur fylgjandi eyðkennir:

•.Internu grunnarnir eru liknir við í fíggjarstøðu landskassans. Ognin hjá grunnunum (tøkur peningur og

útlán) er sett undir teir ymsu aktivbólkarnar í fíggjarstøðuni og passivini undir "Útjavningarkonto" í fíggjarstøðuni.

Allýsing av einum eksternum grunni

Ein eksternur grunnur bevur fylgjandi eyðkenni:

•.Stýri og umsiting.

•.Eksternu grunnarnir eru ikki tiknir við í fíggjarstøðu landskassans og eru undantiknir millumrokningini millum eksternu grunnarnar og landskassan.

Um peningur skal gjaldast úr internu grunnunum, so skal í flestu førum játtan veitast beinleiðis yvir fíggjarlógina, meðan útgjaldingar úr eksternu grunnunum kunnu fara fram uttan játtan á fíggjarlógini, um so er, at grunnarnir eiga innistandandi pening. T.v.s. sjálvt um internu grunnarir ikki eru avtiknir, so kann landsstýrið ikki játta pening til endamálið uttan játtan á fíggjarlógini.

Samanumtikið kann sigast, at tað, sum eyðkennir støðunu bjá hesum grunnum er:

1. Flestu grunnarnir hava verið óvirknir í nógv ár
2. Endamálið við flestu grunnunum kann bert røkkast við at landsstýrið setur pening av á fíggjarlóg.

Landsstýrið fer við hesum at leggja lógaruppskotið um avtøku av landskassagrunnum fyri løgtingið.

1. viðgerð 10. apríl. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 8. mai 1996 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 25. mars 1996 og eftir 1. viðgerð tann 10. apríl 1996 beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur í hesum sambandi eftir áheitan innkallað Sámal Petur í Grund, landsstýrismann, og Jóannes Dalsgaard, landsskjalavørð, til fundar.

Spurningurin um avtøku av landskassagrunnum varð umrøddur í síni heild. Víst var á teir vansar, sum frammanundan hava staðist av at játta pening til grunnar og úr grunnum, uttan at veruliga virksemi landskassans sást á fíggjarlógini.

Nevndin er samd um at miðast skal ímóti at avtaka grunnarnar, tó soleiðis at vissa er fingin fyri, at fortreytirnar eru í lagi, og at samsvar er millum galdandi lógarreglur og eina avgerð um avtøku av ávísum grunnum.

Nevndin hevur nevniliga staðfest, at peningur er játtaður til avvarðandi grunnar samb. serstaka løgtingslóg. Sum dømi kann nevnast løgtingslóg nr. 26 frá 8. mai 1969 um toll av sjónvarpsmóttakarum.

Eisini er upplýst fyri nevndini, at ávísir grunnar fáa tillutað pening beinleiðis frá happadrátti uttan um fíggjarlógina.

Hesi viðurskifti gera tað trupult at avtaka nevndu grunnar, áðrenn øll peningalig og løgfrøðilig viðurskifti eru endalig avgreidd.

Landsstýrismaðurin og landsskjalavørðurin hava upplýst fyri nevndini, at peningurin, sum er játtaður í grunn til bygging av skjalasavni, framvegis er tøkur, sjálvt um innistandandi upphæddin er yvirtikin av landsbankunum.

Víst varð á hølistrupulleikarnar bjá landsskjalasavninum, og tann óvurstóra tørv, sum er á betri og rúmsáttari hølum. Mett varð, at støðan í løtuni, har partar av okkara søguligu dýrgripum vóru spjaddir runt ymsa staðni

í býnum undir vánaligum og ótryggum viðurskiftum, er óbaldhar og ótolandi. Skal tann støðugt vaksandi mongdin av skjalatilfari tryggjast betur og goymast undir meira forsvarligum umstøðum, so er alneyðugt at fara undir fyrireikingar at byggja nýu landsskjalasavn teinanvegin.

Landsskjalavørðurin helt, at ein møguleiki til tess at seta hesa ætlan í verk, var at nýta peningin, sum stendur í grunninum til byggiag av skjalasavni, sum er uppgjørdur til uml. 8-9 mill. kr. og uttan iva kundi verið rokkið langt við eini møguligari bygging.

Rættarnevndin heldur ikki, at ein slík ætlan um at flyta peningin beinleiðis úr grunni til nevndu byggiætlan kann fremjast uttan serstaka heimild á fíggjarlógini.

Rættarnevndin hevur tikið til eftirtektar, at landsstýrið longu í 1991 hevur lagt um til eina skipan, har næstan allar inntøkur/útreiðsfur landskassans skulu standa á fíggjarlógini.

Rættarnevndin hevur annars tikið ta støðu, at tað ikki hevur nakran skund at avtaka nevndu grunnar. Tí eigur landsstýrið at geva sær stundir at kanna hesi viðurskifti gjøllari, samstundis sum syrgt verður fyri at greiða øll ivamál viðvíkjandi stovnsfaci og inntøkugrundarlagi hjá viðkomandi grunnum. Mælt verður tískil landsstýrinum til at leggja fram nýtt uppskot um avtøku av landskassagrunnum, tá øll tey fíggjarligu og løgfrøðiligu viðurskiftini hesum viðvíkjandi eru fingin endaliga upp á pláss.

Ein **samd rættarnevnd** tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins um avtøku av landskassagrunnum og setir eingki uppskot fram.

2. viðgerð 13. mai 1996. Uppskot landsstýrisins fall við 3-0-19 atkvøðum.

F.L. j. nr. 2501-4/91.

94 Javnbjóðis skatting av hjúnum og støkum

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Jørgen Niclasen, vegna fólkaflokkin fram setjiðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Løgtingið heitir á landsstýrið at fyrireika broyting í skattalógini at leggja fyri tingið við gildi fyri skatta árið 1996, so ólønti hjúnafelagin í familju við bert einari inntøku fær sama persónsfrádráttir í lands- og kommunuskatti, sum allir skattgjaldarar við inntøku, fáa.

Viðmerkingar:

Søguliga gongdin
Fólkaflokkurin hevur fleiri ferðir royna at fáa løgtingið til skattliga at javnseta hjún við bert einari inntøku við onnur húski við tveimum inntøkum. Flokkurin hevur skotið upp, at einkarinntøkan verður býtt sundur til skattingar, antin javnt í tvey ella upp til ávísa upphædd í heimarbeiðandi hjúnafelagans part.

Men løgtingið hevur higartil ikki vilja beint fyri tí mannamuni, sum verandi skattalóg ger móti familjum, har annar hjúnafelagin ynskir at arbeiði heima, men sleppur ikki av skattaávum.

Tá fólkaflokkurin seinast (tingmál nr. 17/1994) skeyt upp at beina burtur skattligu diskriminatiónina móti familjum við einari inntøku, samtyktu 20 tingmenn eftir tilmæli frá einum meiriluta í skattanevndini: "Løgtingið áleggur landsstýrinum at kanna avleiðingarnar av einari slíkari skipan, sum uppskotið miðar ímóti." Síðan er einki frætt.

Tað er bæði rímiligt og rætt at steðga skattligu revsingini av familju við einari inntøku. Til dømis ber ein ársinntøka upp á 200.000 kr. uml. 85.000 kr. í skatti, meðan tvær inntøkur upp á 200.000 kr. gjalda uml. 20.000 kr. minni.

Harumframt veitir hitt almenna eini barnafamilju, har bæði foreldur arbeiða úti, eitt nú barnansing, sum kostar hinum almenna uml. 40.000 kr. um árið pr. barn á stovni. Men hjún, har annar hjúnafelagin arbeiðir heima, fáa ikki líknandi sømdir og eru fyri fíggjarligum vanbýti av at ansa sínum egnu børnum heinta. So her gerst almenna diskriminceringin móti barnafamiljum við einari inntøku enn størri.

Í 80-árunum var arbeiði til meir enn allar hendur. Tá var lættari hjá øllum at fáa lønt arbeiði. Nú eru hjá 100-tals familjum mínst onnur inntøkan avloyst av einum útgjaldi frá ALS. Hjá øðrum er onnur inntøkan burtur, so livast má av lægri (samlaðuri) inntøku. Men hjá flestu húskjum eru tvær inntøkur almeyðugar, tí onnur verður haldløgd av skattavaldinum til at fíggja almenna nýtslu. Skattatrýstið er eisini hækkað í sama mun, sum reallønin er lækkað.

Fólkaflokkurin fer aftur at royna at fáa løgtingið við sær til at skatta hjún við einari inntøku javnbjóðis hjúnum og samlivandi við tveimum inntøkum.

Hetta uppskotið miðar eftir at bøta eitt sindur um mismunin í verandi skattaskipan, sum ger, at húsarhald við einari inntøku verða harðari skattað enn húsarhald, har tvey forvinna hvør sína inntøku.

Galdandi lóg
Við broyting í skattalógini í 1992 varð skattaskipanin gjørd einfaldari, og persónsfrádráttur varð innroknaður í skattaálíkningina.

Undir sosialistiska landsstýrinum 1993-94 varð skattatrýstið hert úr 45% upp í 54% av BTÚ, so uml. 250 mió. kr. vóru innkruvdar árliga í skatti og avgjøldum meiri enn framunanundan. Frá í ár eru uml. 85 mió. kr. loraðar útaftur. (Fólkafloksins uppskot um skattalætta var 160 mió. kr.).

Men við hesum uppskoti verður lagt upp til, at hjúnafelagi í familju, sum livir av einari inntøku, fær sama persónsfrádrátt, nevniliga 12.000 kr. í komunu- og 22.000 kr. í landsskatti, sum hjún og samlivandi sleppa skattliga lættari, tí hava hvør sína inntøku, ella har annað fær inntøku frá ALS ella forsorgini.

Hetta uppskotið hevði, umfram at innføra eitt frægari rettvísi í skatting av familjuinntøkum yvirhøvur, eisini fört til, at hjún, tí hava mist aðra inntøkuna, sloppu meiri rímiligt í skatti enn nú. 100-tals fólk detta nú úr ALS-skipanini, og teinum hevði uppskotni persónsfrádrátturin komið vel við.

Kostnaður og umsiting av uppskotinum
Eini 1.000 hjún í Føroyum liva av bert einari inntøku, so komununum hevdu bert mist 12 mió. kr. tilsamans (av tils. 650 mió. kr. í ár). Landskassin hevði bert mist uml. 25 mió. kr. (av tils. uml. 750 mió. kr. í ár). Umsitingarliga er skattaálíkning og innkrevjing so fullautomatiserað, at lítil eykaumsiting hevði staðist av, at uppskotið verður samtykt.

Henda tiltrongda broyting í skattalógini hevði stuðlað foreldrum til, at annað slapp at velja at arbeiða heima undir uppvøkstrinum hjá børnunum soleiðis, at arbeiðsmarknaðurin verður rúmligari og liðiligari. Tað kundi so givið onkrum, sum er trokaður tí í arbeiðsloysi, høvi til aftur at sleppa í lønta vinnu.

1. viðgerð 11. apríl 1996. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 29. apríl 1996 legði fram soljóðandi

Átit

Málið er lagt fram av Fólkaflokkinum tann 25. mars 1996 og varð eftir 1. viðgerð 11. apríl 1996 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin viðgjørdi málið og býtti seg í ein meirluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Álvur Zachariasen, Kristian Magnussen og Finnbogi Arge) tekur ikki undir við uppskoti fólkafloksins.

Ein minniluti (Jørgen Niclasen og Finnbogi Ísaksson) tekur undir við uppskotinum.

Ein annar minniluti (Tordur Niclasen) hevur hesar viðmerkingar:
Miðflokkurin hevur áður víst á týðningin av einum miðvísum familjuvinarligum politikki og legði í hesum sambandi dentin á at fáa við í samgonguskjalið frá 30.08.94, at "hjún ikki skattliga verða fyri vanbýti".

Minnilutin (Tordur J. Niclasen) kann taka undir við uppskoti Fólkafloksins, men ásannandi, at uppskotið soleiðis orðað helst ikki fær meirluta á tingi, ætlar umboð Miðfloksins at seta fram í komandi tingsetu soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Heitt verður á landsstýrið at gera broytingar í skattalógini soleiðis, at galdandi frá 1. januar 1997 verður skattalógin broytt, so møguleiki verður hjá hjúnum at flyta part av inntøkuni sínámillum til skattingar. Tó so, at samlaða skattskylduga inntøkan hjá tí, ið inntøkan verður flutt til, í mesta lagi svarar til 70% av hægsta veiting frá arbeiðsloysisskipanini.

Viðmerkingar:
Uppskotið miðar ímóti at bøta um skattliga mismunin, ið húski við bert tí einu inntøkuni eru fyri, og samstundis at lætta um trýstið á arbeiðsmarknaðin, arbeiðsloysisskipanina og forsorgarhjálpina.

Arbeiðsloysið í Føroyum er stórt, og fyri fleiri húski er galdandi, at bæði maður og kona hava gingið arbeiðsleys í so langa tíð, at tey antin eru ella verða koyrd úr arbeiðsloysisskipanini, og tí er bráðneyðugt, at nakað verður gjørt fyri at fáa í minsta lagi annað teirra aftur í vinnu. Verður uppskot minniluttans samtykt, fer tað tær avleiðingar, at arbeiðspláss kunnu gevast leys, um onnur húski, har bæði kona og maður hava arbeiði, fáa eina motivering fyri, at annað teirra kann velja at gerast heimaarbeiðandi. Hetta kann serliga gera seg galdandi fyri tey, ið hava rímiliga inntøku í løtuni, men hóast tað ikki fáa endarnar at røkka saman við bert einari inntøku. Við skattabýtinum og t.d. spardu útreiðslum til barnaansing verður møguligt hjá hesi familju at klára seg við bert tí einu inntøkuni.

Hugsast kann eisini, at hjún, har annað í løtuni fer arbeiðsloysisstuðul og má ganga undir tær treytir, sum eru fyri hesum stuðli, (t.d. hava børnini í røkt fyri at kunna vera tøkur á arbeiðsmarknaðinum) heldur velja skipanina við skattabýtinum, fyri at sleppa undan hesum treytum, og harvið spara gjøld til dagrøkt o.l. Harvið sparir arbeiðsloysistryggingin eisini veitingina til tann heimaarbeiðandi.

Landskassin kemur í fyrstu syftu at fáa minni skattainntøkur av hesum uppskoti minniluttans (Tordur J. Niclasen) og kann sum dømi nevnast: Maður, ið hevur inntøku kr. 250.000 flytir tær kr. 83.033 til skattingar hjá konuni, úrslitið er, at landskassin fær kr. 18.600 minni í inntøku árliga. Var inntokan kr. 150.000 loysir tað seg ikki at flyta meira enn helvtina, t.v.s. kr. 75.000, og hevur minniinntøka landskassans kr. 13.000.

Tað, ið landskassin fær minni í inntøku, merkir, at hin staka familjan fær hesa upphædd meira at ríða yvir. Samlaður fyribilsmissur landskassans verður neyvan hægri enn kr. 10 mió., men upp á longri sikt er hetta uppskot minnilutans (Tordur J. Nielsen) við til at bøta um býtið av teim arbeiðsplássum, ið eru, og tað vil samtstundis lætta utu tað ovurstóra trýst, ið arbeiðsloysisskipanin knógvar undir.

2. viðgerð 8. mai 1996. Uppskotið fekk 11-0-12 atkvøður og fall.

95 Broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Ivan Johannesen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap við seinni broytingum verður § 27 orðað soleiðis:

"**§ 27.** Heildarkvotur á landleiðunum fyri fiskifør undir føroyskum flaggi verða ásettar fyri hesar fiskastovnar frá 1. september 1995 til 31. august 1996

Tons rund vekt:	
Toskur á Føroya Banka	500
Toskur á landgrunninum	18.500
Hýsa	12.000
Upsi	39.000
Kongafiskur	10.000

Stk. 2. Aftrat heildarkvotum sambært stk. 1. verða ásettar hjáveiðukvotur fyri fiskifør undir føroyskum flaggi fyri hesar fiskastovnar frá 1. september 1995 til 31. august 1996

Tons rund vekt:	
Toskur á Føroya Banka	50
Toskur á landgrunninum	1850
Hýsa	600
Upsi	1950
Kongafiskur	550

Stk. 3. Hjáveiðukvota kann veitast fiskiførum ella bólkum av fiskiførum, sum í veiðu eftir fiskasløgum undir kvotu, ikki sleppa undan hjáveiðu, sum fer út um egnu kvotu ella felagskvotu."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar:

Í august 1995 ásetti løgtingið kvotur fyri fiskiárið 1. september 1995 til 31. august 1996. Hesar verða endurtiknar í stk. 1. Haraftrat heldur landsstýrið, at neyðugt verður at áseta hjáveiðikvotur aftrat teimum í stk. 1 nevndu heildarkvotum, sí annars § 5, stk. 7 og § 18, stk. 3. Fyri inniverandi fiskiár verða hesar hjáveiðukvotur settar soleiðis, at hjáveiðikvotan av toski verður 10% av heildarkvotuni, og fyri hýsu, upsa og konga fiski 5% av heildarkvotunum. Hjáveiðiprosentið verður at galda fyri hvønn túr.

Ítskivinnu Starvsnevndin hevur viðgjørt uppskotið og tekur undir við uppskotinum, tá talan er um eina eykakvotu.

Fiskirannsóknarstovan og Stovnsrøktarnevndin skulu sambært § 22 í lógini lata sínt tilmæli, sum eistni skal fevna um hesa hjáveiðu, sum so kann veitast eigarum av fiskiførum ella bólkum av fiskiførum, sum í veiðu sambært stk. 3 ikki sleppa undan ávísari hjáveiðu. Landsstýrið legði m.a. hetta uppskot fram í 1995, løgtingsmál nr. 91/ 1994 uppskot um broytingar í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, men tá lalt hetta uppskot.

Landsstýrið hevur gjørt upp støðuna hjá fiskiflotanum og er toskakvotan hjá útróðraførum undir 20 BRT um at vera uppfiska. Fyri at ikki allur fiskiskapur skal steðga upp eftir § 18 í lógini, er neyðugt at landsstýrið hevur hesar hjáveiðikvotur tøkar til tess, at fiskiskapur kann halda fram eftir øðrum fiskasløgum sum hýsu og upsa.

Uppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar við sær, og umsitingarligu uppgávurnar eru tær somu.

1. viðgerð 28. mars 1996. Málið varð beint í vinnunevndina, sum 10. apríl 1996 legði fram soljóðandi

Á l i t

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 25. mars 1996 og eftir 1. viðgerð tann 28. mars 1996 beint í vinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við landsstýrismannin í fiskivinnumálum, Ivan Johannesen, fiskivinnustjóran, umboð fyri Fiskirannsóknarstovuna, umboð fyri "Samtakið vinnufeløgini, ið troyta stovnarnar hýsu, tosk og upsa saman við manningafeløgunum og Reiðarafelagnum", og við umboð fyri útróðrarmenn á bátum undir 20 BRT, hvørs toskakvota er uppfiskað og fiskiskapurin støðgaður.

Landsstýrismaðurin segði, at fyri at ikki allur fiskiskapur skal støðga upp, er neyðugt at hava hjáveiðukvotur, so at fiskiskapurin kann halda fram eftir øðrum fiskasløgum. Hann segði, at við fyriliggjandi uppskoti er gjørligt hjá øllum skipabólkum at fiska alt kvotuárið, við undantaki av bólki 6, útróðrabátar undir 20 BRT, har toskakvotan er uppfiskað.

Umboðini fyri "Samtakið vinnufeløgini, ið troyta stovnarnar hýsu, tosk og upsa saman við manningafeløgunum og Reiðarafelagnum" mæltu til at seta uppskot landsstýrisins nr. 96/1995: Broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, ið m.a. umfatar fiskidagatal, í staðin fyri kvotur og sum vinnan hevur viðmælt, í gildi so skjótt sum tingskipanin loyvir tí.

Umboðini fyri útróðrarmenn á bátum undir 20 BRT mæltu til, at bátar undir 20 BRT sleppa at fiska frítt alt árið og at alt, sum eitur kvotur og dagatal fyri henda bólk verður tikið av.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Henrik Old, Heini O. Heinesen, Óli Jacobsen, Jákup Olsen og Álvur Zachariasen) heldur ikki, at bólkur 6, útróðrabátar undir 20 BRT, kann liggja stillur, tað ið eftir er av kvotuárinum fram til 31. august 1996. Neyðugt er tí at broyta uppskot landsstýrisins soleiðis, at hesin bólkur sleppur aftur til fiskiskap. Meirilutin mælir til, at hækka MLV fyri tosk á landgrunninum frá 18.500 til 21.500 tons og hjáveiðukvotuna frá 1850 tons til 2150 tons. Av teimum 3.000 tonsunum, ið MLV-ið verður hækkað, skulu 2.000 tons býtast frá til bólk 6, útróðrabátar undir 20 BRT.

Fyri at tryggja, at kvotan hjá bólki 6 strekkir testina av kvotuárinum, mælir meirilutin til, at avmarka veiðuna beinleiðis eftir toski á landgrunninum hjá hesum bólki. Landsstýrið hevur heimild í § 9, stk. 2 í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap við seinni broytingum í kunngerð at áseta reglur um, hvussu fiskiskapurin skal fara fram. Meirilutin loyvir sær at koma við einum uppskoti til kunngerð at skjóta upp nakrar avmarkingar fyri, at toskakvotan varðir longst møguligt, og at saman við toskakvotuni eisini verður fiskað mest møguligt av øðrum fiskasløgum. Hetta er eisini vent ímóti tí ásaman, at kvotan á Føroya Banka annars ikki verður fiskað. Mælt verður til:

- frá 1. juni 1996 til 31. august 1996 at steðga veiðuni eftir toski á landgrunninum leygardag og sunnudag.

- at **bátar 15 - 19,99** tons BRT fara burtur úr veiðuni eftir toski á landgrunninum í 5 vikur frá 1. mai 1996 til 31. august 1996. Hetta skal avgerast, áðrenn fiskiloyvi verður útskrivað.

- at **bátar 10 - 15** tons BRT fara burtur úr veiðuni eftir toski á landgrunninum í 4 vikur frá 1. mai 1996 til 31. august 1996. Hetta verður avgjørt, áðrenn fiskiloyvið verður útskrivað aftur.

- at allur fiskiskapur eftir toski á landgrunnbum støðgar frá Dýrabiðudegi 3. mai 1996 til og við sunnudegi 5. mai 1996.

Meirihutin mælir løgtinginum at samtykkja uppskot landsstýrisins við framnanfyri nevndu broytingum og setir tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

1) Í § 1, stk. 1, ganga út orðini "verður § 27 orðað soleiðis", og í staðin verður sett: "verða hesar broytingar"

2) Í § 1, stk. 1 (§ 27) verður "toskur á landgrunninum 18.500" broytt til "toskur á landgrunninum 21.500".

3) Í § 1, stk. 2 verður "toskur á landgrunninum 1850" broytt til "toskur á landgrunninum 2150".

4) Sum nýtt § 1, nr. 2 verður sett: "Í § 28, stk. 2 verður "400" broytt til: "2.400", og orðini "til bátar, sum partvís reka útróður og avreiða smærri nøgdir" strikað."

Minnilutin (Jákup Joensen og Anfinn Kallsberg) **fører fram**: Hóast uppskot landsstýrisins einki nevnir um trupulleikarnar hjá bólki 6, nú kvotan hjá hesum bólki er uppfiskað, so hevur vinnunevndin avgjørt at taka hendan spurning upp í málsviðgerðina av onnanfyri nevnda løgtingsmáli. Hóast spurnartekin kann setast við, um heimild er í hesum løgtingsmáli at broyta býti millum veiðuhættir, so hevur ein meiriluti av nevndini avgjørt at gera broyting í grein 28 í lógini um vinnuligan fiskiskap, hóast henda grein ikki er umtalað í uppskoti landsstýrisins.

Minnilutin heldur, at varandi loysn av trupulleikunum hjá øllum fiskiflotanum eigur at verða sett í verk beinanvegin, og at hetta skilagott kann gerast uttan at nerva lógarinnar uppruna ella eyðkenni við broytingum í fyriliggjandi uppskotum landsstýrisins, løgtingsmáli nr. 95/1995 og løgtingsmáli nr. 96/1995, sum bæði í løtuni eru til viðgerðar í vinnunevndini eftir 1. viðgerð í løgtinginum.

Í fyriliggjandi máli mælir minnilutin til at gera hesar broytingar:

Í grein 27, stk. 1, verður 31. august 1996 broytt til 31. mai 1996.

Grein 27, stk. 2, verður broytt soleiðis: Alturat beildarkvotum sambæri stk. 1 verða ásettar fskoytis- og hjáveiðukvotur fyri fiskifør undir føroyskum flaggi fyri hesar fiskastovnar frá 1. september 1995 til 31. mai 1996.

Tons rund vekt:	
Toskur á Føroya Banka	50
Toskur á landgrunninum	2775
Hýsa	600
Upsi	1950
Kongafiskur	550

Grein 27, stk. 3, verður broytt soleiðis: Fiskiførum ella bólkum av fiskiførum, sum eru í veiðu eftir fiskasløgum undir kvotu, kann veitast fskoytiskvota ella hjáveiðukvota har ikki sleppt undan hjáveiðu, sum fer út um egnir kvotu ella felagskvotu.

Løgtingsmál nr. 96/1995, sum er lógaruppskot um fiskidagaskipan í staðin fyri kvotaskipan, verður sett í verk við gildi frá 1. juni 1996. Lógin skal verða galdandi fyri 5/4 ár í fyrsta umfari, nevniliga frá 1. juni 1996 til 31. august 1997 og dagabýtið umroknað samsvarandi.

Skipananevndin, sum landsstýrið sambært § 2, stk. 4. í lógaruppskotinum skal seta við umboðum frá vinnuni, fiskirannsókarstovuni og fiskiveiðueftirlitinum at hava eftirlit við og fyriskipa, at fiskidagatalið fyri hvønn bátk av fiskiførum tryggjar, at stovnarnir verða gagnnýttir burðardygt, soleiðis at endamálið í lógini verður rokkið, skal gera sínar metingar og tiltnæli við hálvum ára millumbili, tó soleiðis at fyrsta tíðarbilið verður frá 1. juni 1996 til 31. desember 1996, og næsta skeiðið frá 1. januar 1997 til 31. august 1997. Orðingin í grein 1 og grein 2 í uppskoti landsstýrisins, løgtingsmál nr. 96/1995 verður at broyta samsvarandi hesum uppskoti minnilutans.

Minnilutin setir fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

1) Í § 1, stk. 1, verður "31. august 1996" broytt til "31. mai 1996".

2) § 1, stk. 2, verður orðað soleiðis:
"Afturat heildarkvotum sambært stk. 1 verða ásettar fiskoytis- og hjáveiðukvotar fyri fiskifør undir føroyskum flaggi fyri hesar fiskastovnar frá 1. september 1995 til 31. mai 1996.

	Tons rund vekt:
Toskur á Føroya Banka	50
Toskur á landgrunninum	2775
Hýsa	600
Upsi	1950
Kongafiskur	550

3) § 1, stk. 3, verður orðað soleiðis:
"Fiskiførum ella bátkum av fiskiførum, sum eru í veiðu eftir fiskasløgum undir kvotu, kann veitast fiskoyttskvota ella hjáveiðukvota har ikki slepst undan hjáveiðu, sum fer út um egnu kvotu ella felagskvotu."

Heini O. Heinesen, umboð Tjóðveldisflokksins, førir fram: Fyri páskir var, eftir míni uppfatan, semja í nevndini, at útróðrarflotin undir 20 tons, sum var komin til Havnar at mótnacla, skuldi sleppa útaftur at fiska, so skjótt sum hetta kundi lata seg gera. Av tí at løgtingsformaðurin gjørdi av, at tað ikki skuldi vera tingfundir í dymbildagavikuni, kundi hetta ikki lata seg gera fyrrenn aftanó páskir.

Nevndin hevði fund aftur leygardagin fyri skírishalguna og viðgjørdið málið. Nevndin var samd um at formaðurin skuldi boða útróðrarbátunum, sum vóru komnir til Havnar frá hesum. Hetta gjørdi so tað, at bátarnir fóru av aftur Havnini, tí teir fingu lyfti um eina loysn. Hesin floti kemur at liggja minst 14 dagar í bestu várstíð, sjálvt um vit samtykkja uppskot meirilutans so skjótt sum gjørligt.

Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin royna nú í minnilutanálitinum at blanda løgtingsmál nr. 96 um fiskidagar í staðin fyri kvotur upp í eina loysn fyri útróðraflotan undir 20 tons skjótast gjørligt.

Tað kann tykjast løgið, at sambandsflokkurin nú skulkar sær undar allari ábyrgd, hóast tað er teirra landsstýrismaður, sum skal eftast at umsita fiskivinnumál í Tingarnesi. Tað var longu greitt í oktober 1995, at flotin undir 20 tons hevði fiskað kvotuna upp fyri fyrsta triðings tíðarskeiðið. Í staðin fyri at finna eina loysn longu tá, um lógin skuldi yvirhaldast, tekur landsstýrismaðurin og flytur kvotuna fyri næsta triðings tíðarskeiðið fram í fyrsta triðings tíðarskeiðið, hóast eingin heimild er í lógini um at fiska fram í tíðina.

Landsstýrismaður sambandsflokksins hevur á fundi í nevndini sagt seg vilja yvirhalda tær avtalur, sum eru gjørdar við donsku stjórnina fyri ein hvønn prís, sjálvt um hetta kemur at kosta tað, at ein stórur partur av okkara fiskiflota skal leggjast longu frá 1. mai í ár, um vit skulu yvirhalda eina mest loyvda veiðu eftir tilráðingini hjá Fiskirannsóknarstovuni og ICES.

Tað sum kann ørkymla okkum í tjóðveldisflokkinum er tað tilfar, sum er komið frá okkara fiskifrøðingum og frá ICES seinasta árið.

	Tilmæli frá Fiskirannsóknarstovuni 1. juli 1995: 1995:	Tilmæli 19. november 1995:	Samtyktu kvoturnar í løgtinginum:
Tons rund vekt:			
Toskur á landgrunninum	10.000	17.000	18.500
Toskur á Føroya Banka	500	500	500
Hýsa	8.500	8.500	12.000
Upsi	39.000	26.000	39.000
Kongafiskur	10.000	10.000	11.000

Tað sum minnilutin, Sambandsflokkurin saman við fólkaflokkinum, nú mælir til, er at hækka toskakvotuna við 15%, meðan landsstýrisuppskotið gøngur út uppá 10%.

Hesi 15% skulu kunna brúkast fram til 31. mai 1996. Tað vil við øðrum orðum siga, at kvotuárið verður niðursett til 3/4 ár samstundis, sum heildarkvotan fyri tosk verður hækkað við 15%. Hetta er tað sama sum at hækka heildarkvotuna við 40%, um kvotan skuldi verið galdandi fyri eitt heilt ár.

Tað sum vit leggja merki til, er at uppsakvotan nú er komin uppá 40.950 tons meðan Fiskirannsóknarstovan mælir til 26.000 tons og kvotan á býsu er 12.600 tons, meðan Fiskirannsóknarstovan mælir til 8.500 tons.

Tað eru ongar viðmerkingar, hvørki frá landsstýrinum ella donsku stjórnini, um hví teir ikki fylgja ráðgevingini frá fiskifrøðingunum, tá talan er um onnur fiskasløg enn tosk. Tað sær í hvussu so er út til, at toskastovnurin er væl fyri, meðan uppsastovnurin er sera illa fyri.

Vit í tjóðveldisflokkinum eru ikki serliga glaðir fyri at fara ovlangt upp um tað sum fiskifrøðingarnir mæla til, men út frá tí støðu, sum serliga Sambandsflokkurin í fiskivinnumálum hevur rent føroyska fiskivinnu út í, við bert at lata standa til við ikki at fylgja lógini um vinnuligan fiskiskap, mælir umboð tjóðveldisflokksins, **Heini O. Heinesen**, til at samtykkja uppskot meirilutans, sum eina loysn, so flotin kann loysa aftur.

2. viðgerð 15. apríl 1996. Meirilutin í vinnunevndini legði fram broytingaruppskot at koma í staðin fyri uppskot sítt í álitinum.

B r o y t i n g a r u p p s k o t

Undirritaðu tingmenn Henrik Old, Heini O. Heinesen, Óli Jacobsen, Jákup Olsen og Álvur Zachariasen seta fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

1) Í § 1, stk. 1, ganga út orðini "verður § 27 urðað soleiðis", og í staðin verður sett: "verða hesar broytingar"

2) Í § 1, stk. 1 (§ 27) verður "toskur á landgrunninum 18.500" broytt til "toskur á landgrunninum 21.800".

3) Sum nýtt § 1, nr. 2 verður sett: "§ 28, stk. 2 verður soljóðandi:
"Áðrenn felagskvotupartarnir verða roknaðir, verða frábýtt 300 tons av toski av landgrunninum at nýta í bólki 4 og 3.400 tons av toski av landgrunninum at nýta í bólki 6.""

Viðmerking:

Síðani álit í málinum er lagt fram, er tryggj uppgerð komin fram, sum vísir, at bólkur 6 hevur fiskað 922 tons úr yvir ásettu kvotuna. Um fiskiskapurin hjá hesum bólki skal halda fram til endan á kvotuárinum, verður neyðugt at leggja hesi tonsini aftutrat hjá bólki 6. Hisini er neyðugt at tryggja at fiskapurin hjá bólki 4, útróðarbátar yvri 20 BRT á hákaveiðu, kann halda fram. Tí verður mælt til, at heildarkvotan fyri tosk á landgrunninum verður hækkað við 3.300 tonsum, og áðrenn felagskvotupartarir verða roknaðir, at 300 tons verða býtt frá til bólk 4 og at 3.000 tons verða býtt frá til bólk 6.

Undirritaðu vísa til viðmerkingarnar í álitinum frá meirilutanum í vinnunevndini um avmarkingar fyri bátar undir 20 BRT. Umfram hesar avmarkingar, halda undirritaðu, at restin av flotanum áttí at verði burtur úr toskaveiðuni líka leingi sum útróðrabátar undir 20 BRT.

Broytingaruppskot meirilutans fekk 14-2-15 atkvøður og fall. Broytingaruppskot minnilutans varð samtykt við 17-2-12 atkvøðum. Samtykt við 17-2-12 atkvøðum at heina mælið soleiðis broytt til 3. viðgerð.
3. viðgerð 17. apríl 1996. Vinnunevndin legði fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t

Undirritaðu lingmenn Henrik Old, Jákup Joensen, John Petersen, Heini O. Heinesen, Karl Robert Johansen, Jákup Olsen og Álvur Zachariasen seta fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

1) Í § 1, stk. 1, verður "kongafiskur 10.000" broytt til "kongafiskur 11.000".

Viðmerking:

Í uppskoti landsstýrisins er villa komin í, har stendur kongafiskur 10.000 tons, rætta talið skal vera 11.000.

Broytingaruppskotið varð samtykt við 29-3-0 atkvøðum. Mælið sum samtykt við 2. viðgerð og broytt við 3. viðgerð endaliga samtykt við 17-11-4 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 46, 18. apríl 1996.

F.L. j.nr. 1501-1/93.

96 Broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Ivan Johannesen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 2, stk. 4. verður orðað soleiðis:

"Stk. 4. Landsstýrið kann seta eina skipanarnevnd við umboðum frá vinnuni, Fiskirannsóknarstovuni og fiskivinnuumsitingini, sum á hvørjum ári metir um, at ásetta fiskidagatalið fyrir hvønn bólk av fiskiførum tryggjar, at stovnarnir verða gagnnýtir burðardygt, og um skipanin við fiskidøgum og stongdum økjum yvirhøvur tryggjar, at endamálini í hesi lóg verða nokkin. Nevndin verður vald fyri 4 ár í senn og ger landsstýrið reglugerð um val og virki nevndarinnar."

2) Nýggj § 4, stk. 4 verður soljóðandi:

"Stk. 4. Innara fiskidagaleiðin er sjógvurin innanfyri beinar linjur drignar gjøgnum hesi tilskiladu stød í hesi raðfylgju:

1) 62°47'00" N, 07°12'00" W.
2) 62°47'30" N, 06°30'00" W.
3) 62°42'00" N, 06°00'00" W.
4) 62°28'00" N, 05°00'00" W.
5) 62°00'00" N, 04°51'00" W.
6) 61°30'00" N, 04°50'00" W.
7) 61°15'00" N, 05°00'00" W.
8) 61°15'00" N, 06°00'00" W.
9) 60°35'00" N, 06°09'00" W.
10) 60°26'00" N, 06°10'00" W.
11) 60°26'00" N, 06°32'00" W.
12) 60°35'00" N, 06°35'00" W.
13) 61°23'00" N, 07°30'00" W.
14) 61°25'25" N, 08°01'00" W.
15) 61°32'48" N, 08°20'30" W.
16) 61°49'00" N, 08°41'48" W.
17) 62°15'00" N, 08°41'48" W.
18) 62°35'00" N, 08°00'00" W."

3) Nýggj § 4. stk. 5 verður soljóðandi:
"Stk. 5. Ytru fiskidagaleiðin er sjógvurin millum 200 fjórðinga sjómarkið og innaru fiskidagaleiðina ásett í stk 4, tó verður Føroya Banki ikki tikin við."
4) Verandi § 4, stk. 4 verður § 4, stk. 6
5) § 5 verður orðað soleiðis:
"§ 5. **Mest loyvda veiða** (MLV) sambært hesi lóg er tað tal og/ella tann nøgd í tonsum, rund vekt, av fiski og dýrasløgum, sum veiðast kann í einum fiskiári úr ávísum fiskastovni á føroysku landleiðunum. Veiðuevnið hjá fiskifari er veiðitrýstið hvørt fiskifar fremur hvønn fiskidag.
Stk. 2. **Heildarkvota** sambært hesi lóg er tann nøgd av fiski í tonsum, rund vekt, sum fiskifør undir føroyskum flaggi hava rættindi at veiða sambært árligum semjum í millumlanda-fiskivinnunevndum og sambært árligum avtalum eftir sínámillum fiskivinnusáttmálum við onnur lond.
Stk. 3. **Veiðuloyvi** sambært hesi lóg er góðkenning, ið Føroya Landsstýri veitir ávísum fiskifari at veiða á føroysku landleiðunum og á leiðum uttanfyri føroysku landleiðirnar.
Stk. 4. **Fiskiloyvi** sambært hesi lóg er tann rættur, sum Føroya Landsstýri hevur latið eigara av ávísum fiskifari, sum hevur veiðuloyvi sambært stk. 3, at veiða **ávíst fiskidagatal og/ella** ávísa nøgd úr ávísum fiskastovnum á ávísum leiðum í ávísum fiskiári. Fiskiloyvi kann eisini verða latið eigara av fiskifari, sum uttan at hava fingið veiðiloyvi sambært stk. 3, fær fyribils ella avmarkaði rættindir at veiða ávísa nøgd úr fiskastovnum á ávísum leiðum í ávísum fiskiári.
Stk. 5. Ein **fiskidagur** er eitt samdøgur og verður roknaður frá midnátt til midnátt í veiði við troli og snellu. Í beinleiðis veiði við línu kann samdøgrið verða roknað sum landsstýrið ásetur. Talið av fiskidøgum, ið eitt fiskifar hevur nýtt ein túr, verður roknað frá tí at túrur byrjar til túrur endar. Tað ber einans til at rokna við heilum fiskidøgum.
Stk. 6. **Felags kvotupartur** er tann partur av heildarkvotu á fjarleiðum av ávísum fiskastovni, ið landsstýrið setur av til at fiska hjá einum bólki av fiskiførum, undir einum.
Felags árskvota er felags kvotuparturin á fjarleiðum roknaður um til tons, rund vekt, av fiski.
Stk. 7. **Egin kvotupartur** er tann prosentpartur av felags árskvotu av ávísum fiskastovni á fjarleiðum, ið landsstýrið hevur latið persóni ella felagi rættin at fiska. **Egin árskvota** er egni kvotuparturin á fjarleiðum roknaður um til tons, rund vekt, av fiski.
Stk. 8. **Hjáveiðupartur** er tann partur í prosentum, sum verður lutaður fiskiførum ella bólkum av fiskiførum til.
Stk. 9. **Fiskiveiðieftirlitið** er tann myndugleiki, sum landsstýrið leggur eftirlit við hesi lóg til.
Stk. 10. **Fiskirannsóknarstovan** er tann stovnur, sum letur landsstýrinum upplýsingar viðvíkjandi støðuni í fiskastovnunum og vísindaligar tilráðingar og metingar samsvarandi endamálinum í hesi lóg."
6) Í § 7, stk. 3 verður pkt. 2) orðað soleiðis:
"2) Ognararnir skulu eiga í minsta lagi 2/3 av ognarpeninginum og skulu uppfylla treytirnar í stk. 2."
7) § 8, stk. 1 verður broytt soleiðis:
"§ 8. Bert persónar og feløg, ið eiga fiskifør, ið hava veiðuloyvi sambært § 5, stk. 4 kunnu fáa rættindi sambært § 5, stk. 4 - 8."
8) § 9, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"§ 9. Landsstýrinum verður heimilað í kunngerð at skipa fyri fiskiskapi hjá fiskiførum undir føroyskum og fremmandum flaggi á føroysku landleiðunum og fiskiskapi hjá fiskiførum undir føroyskum flaggi uttanfyri landleiðirnar og kann landsstýrið m.a. gera reglur um:
1) Reglur um hvussu fiskidagar á innaru fiskidaga-leiðini verða býttir um við fiskidagar á ytru fiski-dagaleiðini og fiskidagaskipan fyri bátar og skip, sum hava serloyvir.
2) Kvotuskipan á fjarleiðum.
3) Fiskidagaskipan, har sum hesir ikki ent býttir út til ávísar skipabólkar eftir hesi lóg.
4) Skyldu at lata veiðufráboðan til eftirlitsendamál
5) Skipan við veiðu- og fiskiloyvum og avgreiðslugjald í hesum sambandi.
6) Vernd av ungfiski og hámark fyri íblanding av ungfiski.
7) Bann fyri at bluka veiði út aftur, og hvørji dýra- og plantusløg koma undir betta bann.
8) Hvussu mótroknað verður, um veitt verður út um ásett fiskidagatal ella kvotu á fjarleiðum og um hvussu virði í mótrokningini verður at nýta.
9) Reglur um hvør er at meta sum fult rikin og ikki fult rikin útróðrarbátur og reglur um innøkumørk.
10) Reglur um veiðibann sunnu- og halgidagar."
9) § 10, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"§ 10. Virking av veiðu umborð á fiskiførum undir føroyskum flaggi á føroysku landleiðunum er

bannað."

10) § 11 stk. 2 verður orðað soljóðandi:

"Stk. 2. Til vinnuligan fiskiskap við fiskiførum undir føroyskum flaggi eftir fiskasløgum, ið koma undir fiskidagaskipan, kvotu- ella aðra skipan sambært § 5 krevst, umfram veiðuloyvi og fiskiloyvi, sum nevnt í stk. 1, ræði yvir fiskidøgum og kvotum, sambært § 5, stk. 5 - 8."

11) Kapittul 3 yvirskriftin verður broytt til: Reglur um fiskidaga- og kvotarættindi.

12) § 12 verður broytt soleiðis:

"§ 12. Skip við veiðuloyvi og fiskiloyvi hava rætt til fiskidagatal á føroysku landleiðunum og skip við avvarðandi veiði- og fiskiloyvi á fjarleiðum hava rætt til kvotupart ella til at fiska burturav heildarkvotu grundað á ásettar reglur við atliti at § 4."

13) § 13 verður strikað.

14) § 14 verður broytt soleiðis:

"§ 14. Fiskidagar kunnu frítt umsetast í hvørjum skipabólki sær. Fiskidagar kunnu bert verða lænir ella leigaðir millum høvuðsbólkarnar, tá 3 mánaðir eru eftir av fiskiártinum eftir nærri reglum, sum landsstýrið ásetur. Fiskiveiðieftirlitið skal hava frábøðan um flyting av fiskidøgum, áðrenn farið verður at fiska fluttu dagarnar.

Stk. 2. Fiskidagar kunnu verða lænir ella leigaðir í hvørjum skipabólki sær í upp til 5 ár.

Stk. 3. Fiskidagar kunnu bert verða lænir ella leigaðir millum høvuðsbólkarnar eftir reglunum í stk. 1 í sama fiskiári."

15) Í § 15, stk. 1 verður "Landsstýrið" broytt til "Fiskiveiðieftirlitið" og í § 15, stk. 2 verður "1 ár" broytt til "5 ár".

16) § 16, stk. 2 verður strikað.

17) Í § 17 verður "§ 5, stk. 6" broytt til "§ 5, stk.7".

18) Í § 18, stk. 1 aftaná fyrsta punktum verður skoytt uppí:

"§ 18. Fiskiskapur skal eisini steðga, tá ið fiskidagarnir fjá einstøkum fiskifari ella bólki eru nýttir." Í § 18, stk. 2 verður skoytt uppí: "ella fiskidagarnir eru nýttir."

19) Í § 21, stk. 1 verður orðið: "heildarkvotu" strikað og ístaðin verður sett inn orðingin: "kvotu- ella fiskidagaskipan".

20) § 22, stk. 1 verður orðað soleiðis:

"§ 22. Við løgtingslóg verður ásett fiskidagatal fyri botnfiskaveiðu á føroyska landgrunninum og fyri Føroya Banka hvørt fiskiárið. Áðrenn 1. juli á hvørjum ári letur Fiskirannsóknarstovan og Skipanarnevndin landsstýritum frágreiðing um støðuna í teimum stovnum, sum verða gagnnýttir á føroysku landleiðunum, herundir serliga teimum, sum eru undir fiskidagaskipan. Í frágreiðingini mæla Fiskirannsóknarstovan og Skipanarnevndin til tiltøk, sum eru neyðug fyri at røkka endamálunum við hesi lóg. Frágreiðingin skal eisini fevna um hjáveiðu. Kemur Fiskirannsóknarstovan fram á, at tívfrøðiligu lortreytirnar, sum vóru galdandi, seinast fiskidagaskipan varð ásett, eru munandi broyttar, skal hon saman við Skipanarnevndini gera nýtt tilmæli um mest loyvdu veiðuna komandi árið."

Í § 22, stk. 2 verður orðið "heildarkvotum" broytt til "fiskidøgum" og í § 22, stk. 3 verður orðið "Heildarkvotur" broytt til "Fiskidagar" og orðið "kvotuskeiðið" verður broytt til "fiskiárið".

21) Í § 26, stk. 1 verður orðingin:"Egnir kvotupartar og árskvotur koma undir somu reglur sum egnir kvotupartar og árskvotur á føroysku landleiðunum." strikað. Ístaðin verður skoytt uppí orðingin: "Egnir kvotupartar og árskvotur koma undir reglurnar í kapittul 3." Sum nýtt Stk. 4. verður sett inn

"Stk. 4. Landsstýrinum verður heimilað, tá fýra mánaðir eru eftir av fiskiárinum, at flyta ónýttir kvotur innanfyri bólkin, ella til annan bólk, sum tørvar hesar, grundað á tilætlingina í hesi lóg."

22) § 27 verður orðað soleiðis:

" § 27. Fiskidagar verða ásettir á landleiðunum fyri fiskifar undir føroyskum flaggi undantikið lemmatrolarar størri enn 1000 HK frá 1. september 1996 til 31. august 1997."

23) § 28 verður orðað soleiðis:

"§ 28. Veiðiflotin verður býttur upp í hesar høvuðsbólkar av fiskiførum á føroysku landleiðunum:

Bólkur 1: Stáltrolarar yvir 400 HK, lemmatrolarar.

Bólkur 2: Stáltrolarar yvir 400 HK, pør.

Bólkur 3: Stállínuskip yvir 110 BRT.

Bólkur 4: Útróðrarbátar yvir 20 BRT á húkaveiðu.

Bólkur 5: Trolbátar undir 85 BRT.

Bólkur 6: Útróðrarbátar undir 20 BRT á húkaveiðu.

Bólkur 7: Onnur veiða.

Stk. 2. Rætturin til tilfeingið á føroysku landleiðunum verður roknað hvørjum høvuðsbólki sær eftir prosentbýti av teimum ymisku fiskastovnunum soleiðis:

	Toskur	Hýsa	Upsi	Kongafiskur
Bólkur 1: Trol, lemmatrolarar	4%	1,75%	13%	90,5%
Bólkur 2: Trol, pør	21%	10,25%	69%	8,5%
Bólkur 3: Línuskip	23%	28%		
Bólkur 4: Útróðrarbátar yvir 20 BRT, húkaveiða	14%	21%	10%	0,5%
Bólkur 5: Trolbátar undir 85 BRT	13%	7%	0,5%	
Bólkur 6: Útróðrarbátar undir 20 BRT	24%	30%	7%	
Bólkur 7: Onnur	1%	2%	0,5%	0,5%"

24) § 29 verður orðað soleiðis:

"**§ 29.** Inman fyri hvønn av høvuðsbólkunum av fiskiførum í § 28, stk. 1, sum eru í veiðiflotanum 1. januar 1995, verður fiskidagaskipan ásett fyri hesar undirbólkar við hesum fiskidagatali, sum verður býtt javnt millum fiskiførini, tó jvb. stk. 3:

Bólkur 2: Partrolarar	8225 fiskidagar
Bólkur 3: Stállínuskip	3040 fiskidagar
Bólkur 4 A: Útróðrarbátar millum 20 - 40 BRT á húkaveiðu	2300 fiskidagar
Bólkur 4 B: Útróðrarbátar millum 40 - 60 BRT á húkaveiðu	1650 fiskidagar
Bólkur 4 D: Útróðrarbátar størri enn 60 BRT á húkaveiðu	1430 fiskidagar
Bólkur 5: Trolbátar undir 85 BRT	1170 fiskidagar
Bólkur 6 A: Útróðrarbátar undir 20 BRT á húkaveiðu- ikki fult riknir	2000 fiskidagar
Bólkur 6 B: Útróðrarbátar undir 20 BRT á húkaveiðu- fult riknir	13000 fiskidagar

Stk. 2. Fyri Føroya Banka verður landsstýrið heimilað at ásetta fiskidagaskipan eftir sama skipan sum fyri landgrunnin, tó við atliti at, hvussu Føroya Banki til eina og hvørja tíð er friðaður fyri ymsar veiðihættir.

Stk. 3. Ásetta fiskidagatalið fyri hvønn skipabólk sær er galdandi fyri fiskiskap á innaru fiskidagaleiðini. Fiskiskapur á ytru fiskidagaleiðini kann bert fara fram, um fiskifar hevur umsett fiskidagar frá innaru fiskidagaleiðini til ytru fiskidagaleiðina. Landsstýrið ásetur nærri reglur um, hvussu fiskidagar verða umsettir frá innaru fiskidagaleiðini til ytru fiskidagaleiðina. Landsstýrið kann luta teir 2000 dagarnir í bólki 6 A út eftir umsókn, ella hesir fiskidagar kunnu setast á uppboð. Landsstýrinum verður somuleiðis heimilað at minka um fiskidagatalið til fiskifør, sum hava serloyvir.

Stk. 4. Fiskifør, ið ikki eru undir fiskidagaskipan jvb. stk. 1 og stk. 2 í hesi grein og fiskifør við serloyvum, hava bert loyvi at veiða á føroysku landleiðunum eftir skipan við hjáveiðiparti, sum landsstýrið ásetur.

Stk. 5. Landsstýrinum verður heimilað, tá tríggir mánaðir eru eftir av fiskiárinum, at flyta ónýttir fiskidagar innanfyri bólkin, ella til annan bólk, sum tørvar hesar, grundað á tilætlingina í hesi lóg."

25) **§ 30** verður strikað.

26) **§ 31** verður broytt soleiðis:

"**§ 31.** Talið av veiðiloyvum, ið koma undir fiskidagaskipan og skipan við hjáveiði eftir botnfiskasløgum á føroysku landleiðunum í hvørjum bólki av fiskiførum undir føroyskum fluggi, er talið av veiðiloyvum, sum vard útskrivað frá landsstýrinum 1. januar 1995."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 1. september 1996.

Viðmerkingar:

Landsstýrið avgjørdi bin 09. november 1995 at seta eina nevnd við umboðum frá vinnuni og umsitingini at gera tilmæli um broyting í reguleringsskipanini fyri fiskiveiðuni á føroysku landleiðunum. Nevndin fekk henda arbeiðssetning:

"Við støði í teinum endamálum landsstýrið hevur ásett fyri fiskivinnupolitikkinum, sum eru, at fiskiveiðan er lívfrøðiliga og búskaparliga burðardygg og skapar fyritreytir fyri, at fiskastovnarnir vaksa aftur, skal nevndin gera eitt tilmæli til landsstýrið um skipanir við teknisku reguleringum, innan fyri teir karmar sum eru settir av løgtinginum í lógini um vinnuligan fiskiskap sum tryggja, at fiskiveiðan ikki fer upp um tað, sum einstaku stovnarnir bera.

Nevndin skal meta um vansar og fyrimunir við teimum skipanuntum, nevndin mælir til, út frá lívfrøðiligum, búskaparligum og eftirlitssjónarmiðum."

Nevndin var soleiðis samansett:
Árni Dam, Osmund Justinussen og Bjarni Vestergaard fyri vinnufelløgini, Kaj P. Mortensen og Kjartan Hoydal (formaður) fyri fiskivinnumsitingina og Hjalti í Jákupsstovu fyri Fiskirannsóknarstovuna. Skrivari hjá nevndini var Andrass Kristiansen.

Skipanarnevndini lat landsstýrinum sína frágreiðing og tilmæli hin 8. februar 1996. Landsstýrið skipaði fyri almennum kjuki um frágreiðingina. Tað sama varð gjørt av einstøkum útróðrafeløgum. Landsstýrið hevur sent løgtinginum frágreiðingina til kunningar.

Tilmæli nevndarinnar er, at í staðin fyri eina skipan við kvotum í nøgd av hvørjum fiskaslag sær, kemur ein skipan við egnum fiskidøgum fyri øll fult vinnuliga rikin fiskifør á føroysku landleiðunum. Fiskidagarnir skulu frítt kunna umsetast í hvørjum skipabólki sær, og tað skal bera til at leggja veiðiloyvi saman innan fyri hvønn bólk, men millum bólkar kann bert verða lænt ella leiga eftir nærri ásettum reglum. Leigan av fiskidøgum millum høvuðsbólkarnar (útróðrarbátar, stállínuskip og trolarar) kann ikki fara fram, fyrr enn 3 mánaðir eru eftir av fiskiárinum.

Føroya Banki fær sína egnu skipan við fiskidøgum. Aftrat hesi skipan verður skipanin við stongdum leiðum varðveitt og víðkað.

Fyri veiði við serligum loyvi verður mælt til hjáveiðureglur, sum skulu tryggja, at hesar veiðir ikki ganga botnfiskaveiðuni á landgrunninum ov nær. Mælt verður til, at veiðan eftir toski, hýsu og upsa undir hesum loyvum verður stýrd við hjáveiðiprosentum, so at hesi veiðiloyvini ikki økja merkisvert um veiðitrýstið á botnfiskastovnarnar. Bert hjáveiða, sum ikki slepst undan, um ávís fiskasløg skulu veiðast, verður loyvd. Fyri djúpvatnslemmatrolarar meira enn 1200 HK verður ásett eitt hjáveiðuprosent upp á 5 % av toski og hýsu tilsamans, fyri djúpvatnslemmatrolarar undir 1200 HK 8 % av toski og hýsu tilsamans og fyri trolbátar við loyvi at fiska flatfisk innan fyri 12 fjórðingar eitt hjáveiðuprosent upp á 30 % av toski og 10 % av hýsu.

Landgrunnurin verður býttur sundur í eina innaru og eina ytru leið.

Mælt verður til, at ein skipanarnevnd við umboðum frá vinnuni, Fiskirannsóknarstovuni og fiskivinnumsitingini á hvørjum ári metir um, um ásetta fiskidagatalið fyri hvønn bólk av fiskiførum tryggjar, at stovnarnir verða gagnnýttir burðardygt, og um skipanin við fiskidøgum og stongdum økjum, yvirhovur, tryggjar, at endamálini í lóg um vinnuligan fiskiskap verða rokkin. Mett verður, at kostnaðurin av nevndini verður tann sami, sum er í dag fyri Stovnsrøktarnevndina. Haraftrat kemur, at § 2 nevndin dettur burtur.

Mælt verður mælir til, at talið av veiðiloyvum verður sett til tað, sum var galdandi 1. januar 1995, og í hvørjum bólki av fiskiførum er talið av fiskidøgum sum í pkt. 24.
Ásetta fiskidagatalið fyri hvønn skipabólk sær er galdandi fyri fiskiskap á innaru leiðini. Eftir nærri ásettum reglum ber til at býta ein fiskidag á innaru leiðini um við tríggjar fiskidagar á ytru leiðini.

Fyri útróðrarbátar undir 20 BRT verður mælt til hesa skipan :

1) 13000 fiskidagar við lítu (ein dagur við lítu er at roknað sum tveir dagar við snellu) verða býttir út til teir bátar, sum eru fult riknir. Báturnir kunnu býta 1 lítudag um til 3 dagar í heinleiðis fiskiskapi eftir kalva ella øðrum fiskasløgum, sum higartil ikki hava verið undir kvotuskipan. Búar, sum hava serloyvi, fáa ikki fult dagatal. Miðað verður ímóti, at hvør bátur uttan serloyvi fær 75 útróðrardagar við lítu.
2) Til teir bátar, sum ikki eru fult riknir, men sum vilja sleppa at avreiða viðhvørt, vera 2000 fiskidagar við lítu tillutaðir tilsamans. Landsstýrið kann luta hesar 2000 dagar út eftir umsókn, ella hesir fiskidagar kunnu setast á uppboð.
3) Mælt verður til, at útróðrarbátum undir 20 BRT verður ikki loyvt at fiska hálgidagar.
4) Mælt verður eisini til broytta skipan við stongdum leiðum soleiðis, at verandi økisfriðingar framvegis verða í gildi við teimum broytingum.

Mælt verður til, at veiðan á Føroya Banka verður stýrd við eini skipan við fiskidøgum fyri seg. Bankin verður framvegis bert opin fyri húkaveiðu.

Landsstýrið hevur gjørt lógaruppskotið sum broyting til verandi lóg, har skipanin á fjarleiðum verður óbroytt sum kvotaskipan við størri umsetuligheit, enn lógin áseur áseur í dag. Tí tann umsetuligheit, sum er í dag, er bert fyri 2 ár og er tíðarfreistin lotgu úti fyri verandi skipan. Hetta eigur at vera broytt til minst 5 ár. Teir, sum hava latið kvotu nú í undanfarnu 2 fiskiár verða at missa sína kvotu, um hetta ikki verður broytt.

Ein nýggj allýsing verður gjørd í grein 5 við hugtøkum inni í lógini, sum skipanarnevndin mælir til.

Ognarviðurskiftini í grein 7 verður mælt til at broyta sum í fyrsta uppskotið landsstýrisins til lóg um vinnuligan fiskiskap, har ognarir av felagsmum skulu eiga 2/3 meirilutan sum navnapartabrøv og annars líka treytirnar í lógini.

Landsstýrið heldur, at nú má støða takast til prinsippið við veiðiloyvi til fult riknar og ikki fult riknar útróðrabátar til fiskifør undir 20 BRT og skrásetingarlógin broytast soleiðis, at øll fiskiskip koma at standa í einari fiskiskipaskrá, meðan øll onnur fiskifør verða skrásett sum stuttleikafør uttan havnakenningarnunnar. Landsstýrið fer at koma við broytingum á hesum økinum.

Tær fíggjarligu og fyrisitingarligu avleiðingarnar av lógaruppskotinum metir landsstýrið soleiðis. Tað verður neyðugt at gera eina minni íløgu í eina fráboðanarskipan, sum tekniskt kann umsitast á tann hátt, at øll fiskifør mugu boða frá, tá tey fara av stað, tá tey royna á innaru ella uttaru fiskidagaleiðini og tá tey koma aftur. Skipanin fer at bøta nógv um trygdina og er ájavnt við tað, sum er galdandi í grannalondum okkara og sum ikki eru hevur verið møguligt í Føroyum. Tín slík skipan kostar umleið 1 mió. kr. og verður umsitin av Fiskiveiðieftirlitinum. Umsitingarliga verður mett, at tað verður brúk fyri minni starvsfólkatali at umsita skipanina í mun til í dag við kvotuskipan.

Fiskivirmo Starvsnevndin hevur viðgjørt málið. Nevndin hevði viðmerkingar til allýsingina av fiskidøgunum, sum landsstýrið hevur fylgt. Tilmælið frá nevndini er hjálagt.

Landsstýrið mælir løgtinginum at samtykkja lógaruppskotið út frá hesi frágreiðing og viðmerkingum.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

ad. 1. Ístaðin fyri verandi § 2 nevnd og stovnsrøktarnevnd verður skotið upp at seta eina 2skipanarnevnd.

ad. 2-3. Innara- og uttara fiskidagaleiðin verður lýst sum økið innanfyri nevndu knattstøður samsvarandi ætlanini um fiskidagar á innara fiskidagaleiðini og uttanfyri.

ad. 5. Broytingarnar liggja í allýsingunum í § 5. Tá fari verður burtur frá kvotuskipan á landleiðunum er neyðugt at innføra nýggjar allýsingar fyri fiskidøgum samstundis sum broytingar verða gjørdar, tá kvotaskipanin nú bert er galdandi á fjarleiðum.

ad. 6. Uppskotið hevur verið lagt fram fyrr av landsstýrinum og hevur sum endamál at tryggja, at ikki ov

stórur partur av føroyska tilfeingimum endar á útlendskum hondum, tí verður mælt til at herða reglurnar um ognarviðurskiftini.

ad. 8. Greinin hevur til endamál at geva landsstýrinum tær neyðugu heimildir til tess at regulera fiskiskapin samsvarandi endamálinum við lógini. Tað er tí neyðugt at hava nærri reglur um fiskidagaskipan innan- og uttanfyri fiskidagaleiðina og reglur um, hvussu fiskifør verða at rokna sum vinnuliga rikin og ikki.

Eisini er neyðugt við greiðari reglum um kvotuskipan á fjarleiðum.

ad. 10. Virking úr veiðu er bannað fyri fiskasløg undir kvotu. Eftir at fiskasløgini ikki verða undir kvotu, er neyðugt at hava bannið í gildi við leimum undantøkum og nærri ásetingum, sum landsstýrið kann áseta eftir stk. 6 í hesi grein.

ad. 12-15. Broytingin ger skilnað millum fiskidagar á føroysku landleiðunum og kvotuskipan á fjarleiðum. Landsstýrið mælir til frían umseting av fiskidøgum innan fyri bólkar í eitt 5 ára skeið, meðan tað millum bólkar bert kann umsetast, tá 3 mðr. eru eftir av fiskiárinum. Henda seinna umseting kann tá bert fara fram í sama fiskiári. Haraftrat verður mælt til, at núgaldandi avmarking at lata ella leiga kvotur á fjarleiðunum verður sett til 5 ár. Landsstýrið ger vart við, at verður eingin broyting gjørd her, so eru tað fleiri fiskifør, sum hava latið kvotu ella bert partar av kvotu til aðrar á fjarleiðum seinastu 2 fiskiárini og sum nú ikki kunnu lata nakað í inniverandi fiskiári ella framyvir, tí hesar kvotur nú falla til felagskvotuna hjá avvarðandi bólki. Nógv dømir eru um hetta í Íslandskvotuna og í Barentshavinum.

ad. 16-19. Broytingarnar eru beinleiðis avleiðingar av, at fari verður frá kvotum til fiskidagar á landleiðunum.

ad. 20. Í staðin fyri heildarkvotur verða ásettir fiskidagar og hjáveiðipartur. Skipanarnevndin fær leiklutin hjá fyriverandi stovnsrøktarnevndini við broyttum málsetningi.

ad. 21. Reglurnar um at lata ella leiga kvotur á fjarleiðum verða at galda eftir sama reglum, sum vóru galdandi á landleiðunum, áðrenn broytingarnar í hesi lóg.

ad. 22-23. Fiskidagar verða ásettir fstaðin fyri kvotur til allar bólkar uttan lemmatrolarar og serloyvisbólkar, sum fáa hjáveiðipart. Veiðiflotin verður samansettur sum higartil og bólkarnir varðveita sama prosentpart av tilfeinginum á landleiðunum, sum higartil.

ad. 24-26. Landsstýrið mælir til at fylgja útrokningini hjá skipanarnevndini og at fiskidagar verða ásettir samsvarandi. Fyri Føroya Banka ger landsstýrið eina líknandi útrokning og verður tá í útrokningini tikið hædd fyrt, at trolveiða er bannað á Føroya Banka, men at hesir bólkar tó eiga lutfallsligan part í tilfeinginum. Útrokningin kann verða gjørd á sama hátt sum hevur verið gjørt við kvoturnar higartil. § 30 hevur ongan týdning longur og verður mælt til at strika hesa grein. Veiðiloyvistalið eftir botnfiskasløgum verður mælt til at fastfrysta samsvarandi veiðiloyvistalinum 1. januar 1996.

1. viðgerð 29. mars 1996. Málið verð beint í vinnunevndina, sum 8. mai 1996 legði fram søljáandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 25. mars 1996 og eftir 1. viðgerð tann 29. mars 1996 beint í vinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur havt fund við umboð fyri Skipanarnevndina, stjórn fyri Vaktar- og Bjargingartænastuni og umboð fyri Meginfelag Útróðrarmanna.
Umboð fyri Skipanarnevndina søgdu, at tað ikki longur verður roknað toska MLV. men daga MLV. Tonsatalið er umsett til fiskidagar. Loftið er rakt, tá talið av fiskidøgum er uppi. Dagtalið fer í meðal at passa yvir 2-3 ár. Á hvørjum árið verður stovnsmeting gjørd og mett verður um, um talið á fiskidøgum passar við

stovnsmetingina. Stovnsmetingar kunna valla gerast meira enn einaferð um árið, tí tað er ikki nóg mikið av tilfari til hálvártigar metingar. MI Við, sum rátt verður til at fiska, er 30% úr stovninum.

Skipanarnevndin kann ikki broyta tølini alla tíðina, men verður fiskiskapurin meira effektiviseraður, so verður neyðugt at hyggja eftir fiskidagatølunum. Tað er ikki gott alla tíðina at regulera, betri er at royna skipanina eina tíð, so kann Skipanarnevndin gera nýggjar metingar. Ein fiskidagur verður roknaður frá midnátt til midnátt og er defineraður í grein 5 í lógaruppskotinum. Neyðugt verður hjá skipi at boða frá hvar fiskað verður. Um fiskað verður ytru leiðini og herta ikki er fráboðað, so verða fiskidagarnir roknaðir, sum vóru teir nýttir á innaru leiðini.

Skipanarnevndin hevur í sínum arbeiði tikið støðu út frá verandi flota, og hevur brúkt sama modell sum canadiarin Jean-Jaques Maguire nýtti til sínar stovnsmetingar, at áseta dagatal fyri hvørn veiðu bólk sær. Nevndin hevur brúkt seinasta 10 ára skeið at rokna miðaltøl út fyri hvørt skip í hvørjum bólki. Allir bólkar, uttan bátar undir 20 BRT, hava fingið ásett fiskidagatøl til hvørt skipið. Fyri bátar undir 20 BRT er bert ásett heildarfiskidagatal. Um hesin bólkur veksur, verður neyðugt at taka frá øðrum bólkum. Bátur við serligum loyvi fáa ikki fult fiskidagatal. Løgtingið hevur við lóg ásett hvussu fiskiskipaflotin skal verða og Skipanarnevndin kann ikki seta seg yvir løgtingi. Tað ber vael til við fiskidagatalsskipanini at regulera verðandi fiskiflota.

Grundtølini, sum nevndin hevur nýtt, eru tey somu sum í verandi skipan. Tað er ein politisk avgerð um hesi tøl skulu broytast. Nevndin var samd um at finna fram til eina stabilari skipan enn verandi kvotaskipan og heldur, at henda skipanin er betur enn verðandi skipan, tí hvørt skipið veit hvussu nógvar fiskidagar tað eigur. Nýggja skipanin hevur tikið tað góða úr verandi skipan og koyrt tað ringa burtur. Nýggja skipanin skuldi gjørt tað, at allur fiskur kemur til sættis og at vit tí fáa rætt veiðihagtøl.

Eisini hevur nevndin mælt til at gera eina skipan við stongdum leiðum. Hesi øki eru størri enn verandi øki. Toskurin má verjast við friðingum og øktar friðingar eru góð verja hjá toskinum. Tær besta toskaleiðirnar verða friðaðar fyri troli. Tær tilmæltu friðingarnar eru ikki tiknar við í lógina, men upplýst varð, at landsstýrið ætlar at lýsa tær í kunngerð. Skipanarnevndin hevur ikki tikið støðu til, um friðingar skulu gerast vit lóg ella kunngerð. Vanlig fiskiár eru eingir trupulleikar við hjáveiðu av toski hjá trolarum á upsaveiði.

Spurningurin um úthlaking í samband við at halda hjáveiðuprosentið, varð umrøddur og varð vístur á, at tað bert eru djúpvatnstrolarar og trolbátar, sum fáa loyvi at fiska flatfisk innanfyri 12 fjórðingar, sum fáa ásett hjáveiðiprosent.

Spurt var um hví "Stovnsrøktarnevndin" er tikin úr lógini. Fort varð av nevndarlimi fram, at tað vóru fiskiveiðufeløgini, umboðandi trol og húk, sum vóru umboðað í hesi nevnd. Í hesum sambandi varð vístur á, at Skipanarnevndin hevur umboð frá vinnuni, Fiskirannsóknarstovni og fiskivinnuumsitingini við, so øll elementini eru savnað í hesi nevnd.

Umsetiligheitin av fiskidøgum var eisini umrødd. Upplýst varð, at fiskidagarnir eru fultumsetiligar, men verða fiskidagar seldur burtur av, er sitan endalig. Møguleiki verður eisini fyri at læna ella leiga fiskidagar út, og tá kunnu fiskidagar leigast ella lænast í mesta lagi í 5 ár.

Skipanarnevndin staðlesti, at dugatulsbroyting átti at verða sett í verk, um upprunatreytirnar fyri dagatalsásetingini broyttust, soleiðis um meir enn ásetta MI Við varð fiskað av tí, at veiðitrýstið varð økt, so skuldi dagatalið skerjast. Vóru fortreytir um veiðutrýst og stovnstrivnaðar umstøður óbroyttar, átti ásetta fiskidagatal at verða varðveitt óbroytt, og vóru stovnstrivnaðarumstøðurnar batnaðar og veiðutrýstið óbroytt, so var grundarlag at hækka ásetta dagatalið

Stjórin fyri Vaktar- og Bjargingartænastuna legði fyri við at siga, at hann ikki var kunnaður um tilmæli frá Skipanarnevndini, men visti um tað frá teirri almennu viðgerð, tilmælið hevði fingið.

Hann segði, at tað tá gerast heilt greitt í fráboðanarskipanini hvør reiðskapur verður nýttur. Hann segði, at V&B fer dagliga nógvar fráboðanir, sum koma yvir telefon og síðani verða skrivaðar inn í teldu á stovninum. V&B arbeiðir við at gera eina nýggja skipan, soleiðis, at tað um telefon verður fráboðað bein-

leiðis inn á teldukervið. Henda nýggja skipan skrásetir beinanvegin fráboðað verður, eisini klokkutíðina. Telefonverki ger hesa skipan, men hann dugdi ikki at siga hvussu skjótt skipanin verður klár at taka í nýtslu.

Viðvíkjandi fiskiskapi á ytru leiðini, segði hann, at her bert verður talan um tey stóru skipini. Tað hevur ógvuliga stóran týdning, at reglurnar um fráboðanarskyldu verða greiðar, og eisini má gerast heilt greitt, hvussu fiskidagatalið skal roknast. Hann segði, at tað eru nógv skip sum ikki mynstra, og at mynstringin er ógvuliga tilvildarlig. Eftirlitið fær nógv at halda skil á, bæði við fiskidøgum, nøgdareftirlit, fiskasløgum og hjáveiðu. Í løtuni eru 1338 fiskiloyvi, øll hava skyldu at senda vektarseðil inn.

Viðvíkjandi eftirlitinum á sjónum segði stjórin á V&B, at umfram skipini, so hevur V&B gjørt avtalu um at leiga ta føroysku tyrluna til eftirlitsflúgving. Tað hevur stóra fyribyrgjandi effekt eisini at hava eftirlit úr luftini.

Vaktar- og bjargingartænastan saknaði møguleikan hjá fiskiveiðieftirlitin at taka fiskiloyvi frá skiputnum sum ikki halda treytirnar, ásettar eru í loyvinum. V&B gevur skrivligar ávaring, tá treytirnar ikki verða yvirhildnar og tá tvær skrivligar ávaðingar eru givnar, skal málið sendast til landsstýrið, men síðani hendur einki. Hann segði, at í øðrum londum verður fiskiloyvið tikið beinanvegin, um treytirnar ikki verða hildnar.

Víst varð í hesum sambandi á grein 45 í lógini um vinnuligan fiskiskap, har m.a. verður sagt, at fiskiveiðueftirlitið kann beinanvegin taka inn veiðu- og fiskiloyvi, um skiparin á fiskifarinum er skuldsettur fyri brot á reglurnar. Stjórin á V&B segði, at tað er Fútin sum skuldsetir fólk, ikki fiskiveiðueftirlitið. Hann segði, at tað hevði havt góðan virkning fyri at reglurnar verða hildnar, um eitt loyvi hevði verið tikið.

Umboðini fyri Meginfelag Útróðrarmanna kravdu, at hákabátar sleppa at fiska frítt. Meginfelag Útróðrarmanna góðtekur ikki fiskidagatalsskipanina, tí felagið metir at fiskidagatalsskipanin fer at elva til ruðuleika í fiskivinnuni.

Vinnunevndin mælir til at Stovnsrøktarnevndin framvegis verður verandi og ger sínar stovnsmetingar til landsstýrið. Nevndin mælir til, at limir, sum verða valdir í Stovnsrøktarnevndina, ikki eisini kunnu veljast í Skipanarnevndina. Nevndin setir fram broytingaruppskot til greinirnar 4, 5 og 22 viðvíkjandi stovnsrøktarnevndini.

Viðvíkjandi grein 5 mælir nevndin til at broyta orðingina í stk. 4 viðvíkjandi fiskiloyvunum. Nevndin vísir í hesum sambandi á løgtingsmál nr. 42/1995.

Í grein 8 í uppskoti landsstýrisins er komin ein prentvilla viðvíkjandi ávísing í greinini til veiðuloyvini, har víst verður á grein 5, stk. 4, hetta skal verða grein 5, stk. 3.

Nevndin heldur ikki at tað er rett, at skip, sum fara av innaru fiskidagaleiðini á ytru fiski-dagaleiðini, kunnu fara í beinleiðis fiskiskap eftir kongafiski og svartkalva og mælir nevndin til, at landsstýrið í kunngerð ásetir hjáveiðunøgd fyri hesi skip og fiskasløg. Nevndin hevur eisini viðgjørt spurningin um fiskiskap eftir toski, og vísir tað sig at fiskiskapurin verður stórri enn upprunaliga vænta, serliga tí at skip hava loyvi at fiska inni á teimum stongdu toskaleiðunum, mælir nevndin til, at landsstýrið fær heimild at seta tíðaravmarkað veiðubann á ávísum leiðum. Mælt verður til at broyta orðingina í grein 9 hesum viðvíkjandi.

Í viðmerkingunum frá landsstýrinum til § 14 verður sagt, at landsstýrið mælir til frála umsetning av fiskidøgum innan fyri bólkar í eitt 5 ára skeið. Hetta kemur ikki greitt fram í lógartekstini og setir nevndin tí fram broytingaruppskot samsvarandi. Nevndin mælir eisini til, at fiskidagar ikki kunnu latast frá húki til trol í bólki 4 og mælir til at broyta orðingina í grein 14, stk. 1.

Nevndin vísir á, at skipini í bólki 3, stálfinuskip, hava fingið 160 fiskidagar hvørt á Føroyagrunninum, men hava fleiri av hesum skipum ymisk serloyvi, m.a. Íslandsloyvi. Nevndin er samd um at tá hesi skip hava eins stórt dagatal á Føroyaleiðini er eisini rímuligt at hesi skip verða eins stillað við serloyvum. Nevndin mælir til, at bólkur 5, trolbátar undir 85 BRT, verður strikaður og at trolbátarnir verða flutir í bólk 4 og fáa sama fiskidagatal sum bátarnir í hesum bólki. Býtisprosentini hjá bólki 5 verða lagd saman við býtisprosentinum í bólki 4. Eisini mælir nevndin til at broyta stødlina á útróðrarbátum í bólki 4 og 6, soleiðis at í

bólki 4 verða útróðrarbátar yvir 15 BRT og í bólki 6 útróðrarbátar undir 15 BRT. Í bólki 6 eru 21 bátar millum 15 og 20 BRT, sum meth verður til at flyta upp í bólk 4 og fáa sama fiskidagatal, sum bátarnir í hesum bólki.

Bólkur 6 A verður strikaður og Bólkur 6 B verður broyttur til bólk 5, útróðrarbátar undir 15 BRT. Bólkur 5, útróðrarbátar undir 15 BRT, fáa tillutaðar 22.000 fiskidagar og verða hesir nýttir samkvæmt ásetning frá landsstýrinum fyri eitt hálvár í senn. Bátar í bólki 5 hava fingið sínar fiskidagar umroknaðar og kunnu hesir fiskidagar ikki umroknast til línu- ella kalvadagar. Nevndin er eftir meting og upplýsingum frá landsstýrinum, komin til at tetr línudagar sum vóru tillutaðir til bólk 5 vildi givið umleið 24.000 fiskidagar um árið sum línu-, kalva- og snelludagar. Nevndin metir, at umsitingin av hesum vildi verið **trupul**, fyri ikki at siga ógjørlig, tí skjýtur nevndin upp at bólkurin fær 22.000 fiskidagar, og tá verður ikki gjørdur munur á línu-, kalva- og snelludøgum. Avsettir eru 1000 fiskidagar, sum landsstýrið kann nýta í teimum førum, har fiskifør hava havt ymisk serloyvi fyri at hesi **ikki** skulu verða verri fyri í fiskidagatalsskipanini, og sum landsstýrið kann nýta í samband við grein 29. Grein 28 og 29 verða broyttar samsvarandi.

Nevndin mælir til, at bátar, sum trola á leiðum, har loyvt hevur verður troling við motororku undir 500 HK, fáa sama fiskidagatal sum bólkur 4. Mælt verður til at henda orðing verður sett inn sum nýtt stykki í grein 29.

Landsstýrið hevur skotið upp, at lógin fær gildi frá 1. september 1996, men í løgtingsmáli nr. 95/1995 samtykti løgtingið, at heildarkvoturnar hava gildi til 31. mai 1996. Tað er tí neyðugt at nýggja skipanin fær gildi frá 1. juni 1996. Neyðugt er, at sett verður inn í grein 22, stk. 3, at fyrsta dagatallsskeiðið er frá 1. juni 1996 til 31. august 1997, og at broyta gildiskomuna í grein 2 í uppskoti landsstýrisins frá 1. september 1996 til 1. juni 1996.

Nevndin er sannførd um, at landsstýrið setir í verk tær friðingar, sum Skipanarnevndin mælir til í sínu frágreiðing.

Við hesum broytingum mælir **ein samd vinnunevnd** tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins og setir tí fram soljóðandi

broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

1) § 1, nr. 1 verður orðað soleiðis:

"§ 2, stk. 4, verður orðað soleiðis:
"Stk. 4. Landsstýrið setir eina skipanarnevnd við umboðum frá vinnuni, Fiskirannsóknarstovuni, fiskivinnumsitingini og fiskiveiðueftirlitinum, sum á hvørjum ári, út frá tilmæli frá Fiskirannsóknarstovuni og Stovnsøktarnevndini, metir um, at ásetta fiskidagatalið fyri hvørn bólk av fiskiførum tryggjar, at stovnarnir verða gagnnýttir burðardygt, og um skipanin við fiskidøgum og stongdum økjum yvirhøvur tryggjar, at endamálini í hesi lóg verða rokkin. Nevndin verður vald fyri 4 ár í senn og ger landsstýrið reglugerð um val og virki nevndarinnar."

2) Í § 1, nr. 5 verða gjørdar hesar broytingar:

"§ 5, stk. 4, verður orðað soleiðis:
"Stk. 4. **Fiskiloyvi** sambæt hesi lóg er tann rettur, sum Føroya Landsstýri hevur latið eigara av ávísum fiskifari, sum hevur veiðuloyvi sambæt stk. 3, at veiða **ávíst fiskidagatal og/ella** ávísa nøgd úr ávísum fiskastovnum á ávísum leiðum í ávísum fiskiári. Fiskiloyvi kann eisini verða latið eigara av fiskifari, sum ikki áður hevur havt veiðuloyvi sambæt stk. 3, soleiðis at veitt verður fyri bils ella avmarkað rettindi at veiða ávísa nøgd úr fiskastovnum á ávísum leiðum í ávísum fiskiári.""

"§ 5, stk. 9, verður soljóðandi:
"Stk. 9. **Stovnsrøktarnevndin.**
Landsstýrið velur stovnsrøktarnevnd. Fiskiveiðufeløgini umboðandi trol- og húkaveiðu hava hvør sínar tveir limir og tiltakslimir í stovnsrøktarnevnd, sum gevur landsstýrinum sítt tilmæli um mest loyvdu veiði. Nevndin verður vald fyri 4 ár í senn. Landsstýrið ger reglugerð um vat og virki nevndarinnar og tryggjar nevndini neyðugt tilfar, fyri at nevndin kann lata landsstýrinum so neyvt tilmæli sum gjørligt.

§ 5, stk. 9 og § 5, stk. 10, verða broytt til § 5, stk. 10 og § 5, stk. 11."

3) § 1, nr. 7 verður orðað soleiðis:

"§ 8, stk. 1 verður broytt soleiðis:
"§ 8. Beri persónar og feløg, ið eiga fiskifør, ið hava veiðuloyvi sambært § 5, stk. 3 kunnu fáa rettindi sambært § 5, stk. 4 - 8.""

4) Í § 1, nr. 8 verða gjørdar hesar broytingar.

"§ 9, nr. 1 verður orðað soleiðis:
"Reglur verða gjørdar um hvussu fiskidagar á innaru fiskidagaleiðini verða býttir um við fiskidagar á ytru fiskidagaleiðini við neyvari tilskilan av kongafiski og svartkalva hjáveiðunøgd og fiskidagaskipan fyri fiskifør, sum hava serloyvir."

Sum nýtt § 9, nr. 11 verður sett:
"Tíðaravmarkað veiðubann á ávísum leiðum við ávísum reiðskapi eftir tiltaðingartørvi fiskidagatalsskipaninnar."

5) Í § 1, nr. 14 verður gjørd henda broyting:

"§ 14, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"**§ 14.** Fiskidagar kunnu frítt umsetast í hvørjum skipabólki sær í eitt fimm ára tíðarskeið. Fiskidagar kunnu bert verða latnir ella leigaðir millum høvuðsbólkarnar, tá 3 mánaðir eru eftir av fiskiárinum eftir nærri reglum, sum landsstýrið ásetur. Tó kunnu fiskidagar í bólki 4, § 29, stk. 1, ikki latast frá húki til trol. Fiskiveiðiettirlitið skal hava fráboðan um flyting av fiskidøgum, áðrenn farið verður at fiska fluttu dagarnar.""

6) § 1, nr. 20 verður gjørd henda broyting:

"§ 22, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"**§ 22.** Við løgtingslóg verður ásett fiskidagatal fyri botnfiskaveiðu á føroyska landgrunninum og fyri Føroya Banka hvørt fiskiárið. Áðrenn 1. juli á hvørjum ári letur Fiskirannsóknarstovan og Stovnsrøktarnevndin landsstýrinum hvør sína stovnsmeting. Út frá hesum stovnsmetingum kemur Skipanarnevndin við tilmæli til landsstýrið um hvussu fiskiskapurin skal skipast komandi fiskiár. Koma Fiskirannsóknarstovan og Stovnrøktarnevndin fram á, at lívfrøðiligu fortreytirnar og veiðuorkan, sum vóru galdandi, seinast fiskidagaskipan varð ásett, eru munandi broytnar, skal Skipanarnevndini út frá hesum gera nýtt tilmæli um nýtt fiskidagatal og mest loyvdu veiðuna komandi árið (MLV)."

"§ 22, stk. 3 verður orðað soleiðis:
"Fiskiárið byrjar 1. september og endar 31. august. Tó gongur hetta fyrsta dagatalsskeiðið frá lógarinnar gildiskomu 1. juni 1996 til 31. august 1997, og verður fiskidagatalið ásett samsvarandi. Fiskidagar fyri komandi árið verða ásettir í seinasta lagi 10. august sama árið, fiskiárið byrjar.""

7) § 1, nr. 23 verður orðað soleiðis:

"§ 28 verður orðað soleiðis:
"**§ 28.** Veiðiflotin verður býttur upp í hesar høvuðsbólkar av fiskiførum á føroyska landleiðunum:

Bólkur 1: Stáltrolarar yvir 400 HK, lemmatrolarar.
Bólkur 2: Stáltrolarar yvir 400 HK, pør.
Bólkur 3: Stállínuskip yvir 110 BRT.
Bólkur 4: Útróðrarbátar yvir 15 BRT.
Bólkur 5: Útróðrarbátar undir 15 BRT á húkaveiðu.
Bólkur 6: Onnur veiða.
Stk. 2. Rætturin til tilfeingið á føroyska landleiðunum verður roknað hvørjum høvuðsbólki sær eftir prosentbýti av teimum ymisku fiskastovnunum soleiðis:

	Toskur	Hýsa	Upsi	Kongafiskur
Bólkur 1: Trol, lemmatrolarar	4%	1,75%	13%	90,5%
Bólkur 2: Trol, pør	21%	10,25%	69%	8,5%
Bólkur 3: Línuskip	23%	28%		
Bólkur 4: Útróðrarbátar yvir 15 BRT.	27%	28%	10,5%	0,5%
Bólkur 5: Útróðrarbátar undir 15 BRT	24%	30%	7%	
Bólkur 6: Onnur	1%	2%	0,5%	0,5%""

8) Í § 1, nr. 24 verða gjørdar hesar broytingar:

"§ 29, stk. 1 verður orðað soleiðis:

"**§ 29.** Innan fyri hvønn av høvuðsbólkunum av fiskiførum í § 28, stk. 1, sum eru í veiðiflotanum 1. januar 1995, verður fiskidagaskipan áseett fyri hesar undirbólkar við hesum árliga fiskidagatali, sum verður býtt javnt millum fiskiførini, tó jvb. stk. 3:

Bólkur 2: Partrolarar	8225 fiskidagar
Bólkur 3: Stállínuskip	3040 fiskidagar
Bólkur 4 A: Útróðrarbátar millum 15 - 40 BRT	4700 fiskidagar
Bólkur 4 B: Útróðrarbátar millum 40 - 60 BRT	3080 fiskidagar
Bólkur 4 D: Útróðrarbátar størri enn 60 BRT	1540 fiskidagar
Bólkur 5: Útróðrarbátar undir 15 BRT á húkaveiðu	22000 fiskidagar
Tøkir	1000 fiskidagar

Í § 29, Stk. 3 verður setningurin "Landsstýrið kann lata teir 2000 dagarnir í bólki 6 A út eftir umsókn, ella hesir fiskidagar kunnu setast á uppboð." strikaður.

Sum nýtt § 29, stk. 4 verður sett:
"Fiskidagatalið fyri bólk 5 verður nýtt samhvert áseting frá landsstýrinum fyri eitt hálvár í senn. Fiskidagatalið er umroknað og kann ikki umroknast til línu- ella kalvadagar."

§ 29, stk 4, verður § 29, stk. 5, og § 29 stk. 5 verður § 29, stk. 7.

Sum nýtt § 29, stk. 6 verður sett:
"Stk. 6. Bátur, sum trola á leiðum, har loyvt hevur verður troling við motororku undir 500 HK, fáa fiskidagatal sum bólkur 4."

9) § 2 verður orðað soleiðis: "**§ 2.** Henda lóg kemur í gildi 1. juni 1996."

Heinl O. Heinesen, umboð tjóðveldisfloksins fører fram: Teir løgtingsmenn, sum atkvøddu fyri minniluuppskotinum frá Jákupi Joensen og Anfinni Kallsberg í løgtingsmáli nr. 95/1995 hava í veruleikanum bundið løgtingið til at seta løgtingsmál nr. 96/1995 í gildi frá 1. juni 1996, í staðin fyri, sum landsstýrið skjeyt upp, frá 1. september 1996. Teir, sum atkvøddu fyri minniluuppskotinum vóru: Sambandsflokkurin, Fólkaflokkurin, Kristiligi Fólkaflokkurin - Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokkur, Óli Jacobsen og Finnbogi Arge, 17 tingmenn. Tað kann tí ikki vera nakar ivi um, at løgtingsmál nr. 96/1995 um fiskidagatal verður samtykt.

Undir 1. viðgerð av løgtingsmáli nr. 96/1995 førdi eg fram um fiskidagatal, at Tjóðveldisflokkurin kom ikki at taka undir við lógaruppskotinum uttan so, at munandi broytingar vórðu gjørdar í uppskotinum.

Av tí at nevndin er samd um nakrar av hesum broytingum, kann umboð tjóðveldisfloksins taka undir við, at broytingarnar verða samtyktar.

Tað, sum eg ikki kann taka undir við er grein 4, stk. 34, um innaru og ytru fiskidagaleiðina, har fiskifør kutmu fáa trýggjar dagar fyri ein, um farið verður út um ringin. Hetta ger, at ein partur af fiskiflotanum fiskar frítt. Sum dømi kann eg nevna partrolararnar, sum hava fingið 235 fiskidagar tiltutaðar. Um farið verður út um ringin, fáa hesir trýggjar dagar fyri ein innanfyri, hetta ger lógina ómøguliga at umsita.

Tað, sum eg haldi hava størsta týðning í stovnsrøktar politikkinum, er, at løgtingsmál nr. 108/1995 er samtykt so gott sum einmælt av løgtinginum. Hetta eru tey trolfrúa økini.

Lasse Klein, umboð Kristiliga fólkafloksins, kann ikki taka undir við uppskoti landsstýrisins og heldur, at politikarar nú gera tað sama sum limirnir í bæði bygnaðarnevndini og skipanarnevndini hava skákað sær undan, nevniliga spurninginum um, hvussu ið veiðiflotin skal verða samansettur, hvussu nógvir, hvussu stórir og hvat slag av trolarum skulu royna á Føroyagrunninum, partrolarar, lemmatrolarar, og trolbátar, umfram hvussu nógv stór línuskip skulu fáa veiðu- og fiskiloyvi á grunninum.

Limirnir í bygnaðarnevndini og skipanarnevndini hava fört fram, at hetta er ein politiskur spurningur, sum teir ikki vórðu bidnir um at greiða.

Tí liggur bótturin hjá okkum politikurum fyrst og fremst í landsstýrinum og vinnunevndini og í seinasta lagi hjá løgtinginum.

Fyrreen spurningurin um samansetingina av veiðuflotanum er greiddur, sleppa vit ikki burtur úr tí ruðuleika, sum valdar á fiskivinnuøkinum, og sum hevur verið við til at seta okkum undir danska fyrisiting, eisini á fiskivinnuøkinum.

Tí fer umboð Kristiliga fólkafloksins at leggja soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar á ting komandi tingsetu

Heita verður á landsstýrið innan árslok at finna fram til og leggja fyri løgtingið uppskot um, hvussu veiðiflotin á Føroyagrunninum í framtíðini skal verða samansettur fyri at gagnnýta náttúruilfeingið optimalt og burðardygt undir marknaðarbúskaparligum treytum.

Umboð Kristiliga fólkafloksins Lasse Klein loyvir sær eisini at vísa á, hvat ið skipanarnevndin fører fram um møguleika fyri øktum effektiviteti og tí stórri trýsti á fiskastovnarnar við fiskadagaskipan, sum ikki kann koma frá verandi húkaveiðuflota, men partrolarum, sum "hava møguleika at nýta dupultrol og harvið økja um veiðuorkuna við 1/3."

Tí eigur ein fiskidagaskipan ikki at standa einsamøll.

Er trýstið á fiskastovnarnar ov stórt, sum tað hevur verið, so másti tú avmarkað teir, sum gera hetta trýst, og tað er ikki útróðrarbátarnir undir 20 BRT ella teir, ið veiða við húki, men tann effektivi trolaraflotin, serliga partrolararnir. Teir kunnu avmarkast við, at eitt minni tal av trolarum fær loyvi til at royna á grunninum. Umboð Kristiliga fólkafloksins Lasse Klein kundi hugsa sær, at gjørt hesa broyting

1) § 28 verður orðað soleiðis:
"§ 28. Veiðiflotin verður býltur upp í hesar høvuðsbólkar av fiskiførum á føroysku landleiðunum:

Bólkur 1: Stáltrolarar yvir 400 HK, lemmatrolarar.

Bólkur 2: Stáltrolarar yvir 400 HK, pør.

Bólkur 3: Stálfmuskip yvir 110 BRT.

Bólkur 4: Útróðrarbátar yvir 20 BRT á húkaveiðu.

Bólkur 5: Trolbátar við serloyvi.

Bólkur 6: Útróðrarbátar undir 20 BRT á húkaveiðu.

Bólkur 7: Onnur veiða.

Stk. 2. Rætturin til úlfeingið á føroysku landleiðini verður roknað hvørjum høvuðsbólki sær eftir prosentbýti av teimum ymisku fiskastovnunum soleiðis:

	Toskur	Hýsa	Upsi	Kongafiskur
Bólkur 1: Trol. lemmatrolarar	3,5%	1,75%	13%	89,5%
Bólkur 2: Trol. pør	16,5%	8,25%	67%	8,5%
Bólkur 3: Stálfmuskip	25%	29%		1%
Bólkur 4: Útróðrarbátar (20-)	20%	24%	12%	0,5%
Bólkur 5: Trolbátar	9%	5%		
Bólkur 6: Útróðrarbátar (-20)	25%	30%	8%	
Bólkur 7: Onnur	1%	2%		

22) "§ 29 verður orðið soleiðis:
"§ 29. Innan fyri hvønn av høvuðsbólkunum av fiskiførum í § 28, stk. 1 sum eru í veiðuflotanum 1. janúar 1996, verður fiskidagaskipan ásett fyri hesar undirbólkar við hesum fiskidagatali, sum verður býtt javnt millum fiskiførini, tó jvb. stk. 3.

Bólkur 2: Partrolarar	5000 fiskidagar
Bólkur 3: Stálfmuskip	3500 fiskidagar
Bólkur 4A: Útróðrarbátar millum 20-40	
Bólkur 4B: Útróðrarbátar millum 40-60	
Bólkur 4D: Útróðrarbátar millum 60-	
Bólkur 6A: Útróðrarbátar undir 20, ei fult riknir	
Bólkur 6B: Útróðrarbátar undir 20, fult riknir	

Bókur 4, útróðrarbátar yvir 20 BRT, sum avreiða daggamlan fisk, og **bólkur 6,** útróðrarbátar undir 20 BRT, sum eisini avreiða daggamlan fisk, eru avmarkaðir av veðri og streymi og fiska tí frát.

Sum frágreiðing til 1) og 2) kann verða víst á, at hetta eru tølini smb. søguglig nettindi, sum landsstýrið helt seg til og setti uppskot fram um, tá ið kvotulógin á fyrsta sinni var til viðgerðar í løgtinginum, sí hjálagda skjal.

Men sum ikki einaferð vórðu hesi tølini broytt til fyrimunar fyri trolaraflotan undir viðgerðini í løgtinginum.

Bólkur 5, trolbátar, sum trola eftir flatfiski, vóru upprunaliga ein lítil partur av bólki 4, útróðrarbátar yvir 20 BRT.

Men nú hevur landsstýrið tillutað teimum helvtina av toskakvotuni hjá útróðrarbátunum yvir 20 BRT, 13% og hinum 14%, so tað er neyvan flatfisk, landsstýrið hugsar um.

Harumframt er tonsatalið hjá hesum bátum sett upp til 85 BRT, tí at 3 bátar, sum trola uttan fyri 12 fj., nú eisini skulu uppí.

Fyrr varð roynt at minka um henda bólk og geva bátum nógvar hundrað túsund krónur í uppbøggingarstuðli fyri at fáa teir at gevast, men tað legst alla tíðina á ein ella annan løgnan hátt afturat, so at talið nú er 18 trolbátar, ið fara við nærum helvtini av toskakvotuni hjá útróðrarbátum yvir 20 BRT.

Eisini tað vísir, hvussu trolingin bara økist og sum havhestur tekur røkurnar hjá øðrum - við vælvild landsstýrisins.

Umboð Kristiliga fólkafloksins Lasse Klein kann taka undir við tekniskum reguleringum, men loyvir sær at minna á, at tekniskar reguleringar er ikki bara skipan við fiskidagatali.

Tað er eisini neyðugt við friðingum. Í løtuni er tað serliga upsastovnurin, sum er undir stórum veiðitrýsti frá partrolarum í gýtingartíðini á bestu gýtingarleiðini eysturi í Holinum - smb. semju millum vinnufeløgini hin 4. januar 1994.

Tekniskar reguleringar er eisini skipan við legudøgum, sum eigur at galda øll skip, ikki bara útróðrarbátarnar undir 20 BRT, sum kunngerðin hjá landsstýrinum frá 19. apríl 1996 § 1, stk. 1 boðar.

Tekniskar reguleringar er eisini at áseta áðurnevnda ávísa talið av skipum, t.d. trolarum, sum kunnu veiða á grunninum ávísa tíð av árinum.

Umboð Kristiliga fólkafloksins Lasse Klein mælir framhaldandi til, at útróðrarbátar, sum avreiða daggamlan fisk, fiska frítt, tí at teir eru longu avmarkaðir av veðri og streymi. Tað eru ikki teir, ið skapa trýstið á fiskastovnarnar. Hetta vil betra um góðskuna.

Men orsakað av, at eingin politiskur meiriluti í løtuni er fyri hesum sjónarmiðum, hevur umboð Kristiliga fólkafloksins avgjørt at taka undir við meirilutanum, men fer seinni at koma við uppskoti um broyting í hesi lóg.

Minnilutin (**Álvur Zachariasen**) ásannar, at uppskotið frá Skipanarnevndini ikki er nøktandi sum stýringsamboð við einari framtíðar fiskivinnu í huga, eisini verður húkaveiðan fyri vanbýti í mun til trolveiðuna, í veruleikanum kunnu teir í minsta lagi fiska 325 dagar, eisini er orsøk til at meta, at hesin veiðubáttur fer at nýta dupulta manning, harvið áhaldandi troyta toskastovnin harðari enn húkaveiðan, tá verður spurningurin, um hesi viðurskifti verða haldbar framyvir. Við núverandi skipan hevur toskastovnurin ment seg aftur, og ber hetta prógv um, at henda skipan ikki hevur verið oyðandi fyri toskastovnin, tí eru øll tekin til, at vit um stutta tíð aftur kunnu fiska optimalt úr hesum stovni. Tí mælir minnilutin (Álvur Zachariasen) til, at varveita verðandi skipan við hesum broytingum:

1. Fiskifør undir 20 BRT sum veiða við húkl eiga frítt at fiska, men við legudøgum, sum landstýri ásetur, sum til dømis sunnu- og halgidagar, ávísar leygardagar í samband høgtíð.

2. Øll fiskifør yvir 20 BRT fáa tillutað egna kvotu, sum ikki kann seljast ella setast í veð.
Í øðrum lagi tekur minnilutin (Álvur Zachariasen) undir við uppskoti meirihluans.

2. viðgerð 13. mai 1996. Broytingaruppskot frá samdari nevnd pkt. 1-8 samtykt við 20-5-2 atkvøðum. § 1. pkt. 2 í uppskoti landsstýrisins samtykt við 19-2-6 atkvøðum. § 1 soleiðis broytt samtykt við 21-4-2 atkvøðum. Broytingaruppskot frá samdari nevnd pkt. 9 samtykt við 20-5-2 atkvøðum. § 2 soleiðis broytt samtykt við 21-4-2 atkvøðum. Samtykt við 22-3-2 atkvøðum at beina málið soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

14. mai 1995 varð loyvi tingsins fingið at víkja frá tíðarfreistini millum 2. og 3. viðgerð. Samtykt við 29-0-0 atkvøðum.

Heini O. Heinesen legði vegna seg sjálvan og løgtingsmenninar Henrik Old, Jákup Joensen, John Petersen, Álvur Zachariasen, Jákup Olsen og Óli Jacobsen fram soljóðandi

Broytingaruppskot

1) Í § 1, nr. **14** verður gjørd henda broyting:

Í § 14, stk. 1 verða orðini "í eitt fimm ára tíðarskeið" strikað.

2) Í § 1, nr. 15 verður skoyt uppí:

Í § 15, stk. 2 verður orðið "tvey" broytt til "fimm"

3) Í § 1, nr. 20 verður gjørd henda broyting:

Í § 22, stk. 1 verða orðini "og mest loyvdu veiðuna komandi árið (MLV)" strikað.

4) § 1, nr. 23 verður gjørd henda broyting:

"§ 28, stk 2, verður orðað soleiðis:
"**Stk. 2.** Rætturin til tilfeingið á føroyska landleiðunum verður roknað hvørjum høvnsbólki sær eftir prosentbýti av teinum ymisku fiskastovnunum soleiðis:

	Toskur	Hýsa	Upsi	Kongafiskur
Bólkur 1: Trol, lemmatrolarar	4%	1,75%	13%	90,5%
Bólkur 2: Trol, pør	21%	10,25%	69%	8,5%
Bólkur 3: Línuskip	23%	28%		
Bólkur 4: Útróðrarbátar yvir 15 BRT.	31%	34,5%	11,5%	0,5%
Bólkur 5: Útróðrarbátar undir 15 BRT	20%	23,5%	6%	
Bólkur 6: Onnur	1%	2%	0,5%	0,5%

5) Í § 1, nr. 24 verða gjørdar hesar broytingar:

Í § 29, stk. 1 verður aftaná orðini "javnt millum fiskiførini," sett inn "bólkur 5 tó undantikin,".

Í § 29, stk. 3 verður seinasta punktum: "Landsstýrinum verður somuleiðis heimilað at minka um fiskidagatalið til fiskifør, sum hava serloyvir." strikað.

Sum nýtt § 29, stk. 5 verður sett.
"Fiskifar í bólki 4, ið roynir við húki, og ikki veiddi við troli áðrenn 1. januar 1995, kann ikki leggja um til trolveiðu".

§ 29, stk. 5 verður § 29, stk. 6, § 29, stk. 6 verður § 29, stk. 7 og § 29, stk. 7 verður § 29, stk. 8.

Viðmerkingar:

Undir 2. viðgerð av málinum boðaði formaðurin í vinnunevndini frá, at vinnunevndin til 3. viðgerð fór at seta fram broytingaruppskot í málinum.

Fiskiárið byrjar 1. september og endar 31. august. Fiskidagatals ásetingarnar í álitinum frá vinnunevndini eru fyri eitt fiskiár. Fyrsta fiskiárið er tó frá 1. juni 1996 til 31. august 1997, ella 5/4 ár, og verður fiskidagatalið fyrsta fiskiárið ásett samsvarandi eftir lutfallinum í einum fiskiári. Hóast fyrsta fiskiárið er roknað til 5/4 ár kunnu fiskidagar ikki flytast fram um 1. september 1996. Heldur ikki kunnu óbrúktir fiskidagar áðrenn 1. september í fiskiárið flytast til nýtt fiskiár.

Trolbátarnir eru fluttir í bólk 4, og mælt verður til, at ikki verður givið loyvi til bátar, sum higartil hava roynt við húki, og sum ikki veiddu við trolið áðrenn 1. januar 1995, at leggja um til trolveiðu. Um trollbátarnir fáa serloyvi, eitt nú at fiska innanfyri 12 fjórðingar, økir hetta ikki um fiskidagatalið bjá besum bátum.

Í lógini um vinnuligan fiskiskap verða ymisk nøvn nýtt til teir ymisku bólkarnar, t.d. stáltrolarar, stállínuskip, trol, línuskip, bátar, skip og fiskifør. Frá fiskivinnuumsitingini er upplýst, at umsitingin er varug við hesi viðurskifti og hevur ætlanir at gera broytingar, so nøvnini verða eins fyri teir ymisku bólkarnar og verðu væntað, næstu ferð lógin um vinniligan fiskiskap kemur fyri tingi, at hetta verður broytt.

3. viðgerð 15. mai 1996. Broytingaruppskotið pkt. 1 fekk 12-3-15 atkvøður og fall. Pkt. 3 fekk 11-4-15 atkvøður. Pkt. 2, 4 og 5 vórðu samtykt við 26-3-1 atkvøðum. Málið endaliga samtykt við 20-5-5 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 50, 20. mai 1996.

F.L. j.nr. 1501-1/93.

97 Broyting í løgtingslóg um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m.

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Axel Nolsøe, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um trygdargrunnin fyri avreiðingar og lønir v.m.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 68 frá 9. juni 1988 um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m. við seinni broytingum verður gjørd hendan broyting:
§ 7, stk. 4 verður orðað soleiðis:
"Arbeiðsgevaragjaldið og rentur eftir hesi lóg og innkrevjingarkostnaður av hesum kunnu krevjast inn við panting."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar:

Fyriliggandi uppskot til broyting í løgtingslóg um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir inniheldur smávegis broytingar í innkrevjingarreglunum í lógini.

Sum lógin er orðað í dag, er tað bert arbeiðsgevaragjøldini og rentur av hesum, ið kunnu krevjast inn við panting. Hetta førir við sær óneyðugar trupulleikar og eyka kostnað í mun til innkrevjingina av eftirstøðum til grunnin, og verður tí skotið upp, at víðka pantiheimildina til eisini at fevna um møguligan innheintingarkostnað.

1. viðgerð 16. apríl 1996. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 30. apríl 1996 legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 25. mars 1996 og beint í rættarnevndina eftir 1. viðgerð tann 16. apríl 1996.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Bjørn á Heygum, Sune Jacobsen, Marita Petersen, Signar á Brúnni, Lasse Klein og Ingeborg Vinther) tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja tað.

Minnilutin (Jógvan á Lakjuni) vísir á, at hetta bara er ein annar máti hjá tí almenna at økja um sínar inntøkur fyri at uppihalda einum frammanundan alt ov stórum almennum sektori. Kostnaðarstigið hjá vinnuni er alt ov høgt, sum er og hetta er enn ein eykabyrða at leggja á vinnuna, tí tekur minnilutin ikki undir við uppskotinum.

2. viðgerð 7. mai 1996. §§ 1 og 2 samtyktar við 20-0-4. Samtykt við 21-0-4 atkvøðum at beina málið til 3. viðgerð.

3. viðgerð 14. mai 1996. Málið endaliga samtykt við 17-1-5 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 61, 20. mai 1996.
F.L. j.nr. 1334-5/93.

98 Broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Axel Nolsøe, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskut

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 39 frá 7. mai 1991 um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn við seinni broytingum verður gjørd henda broyting:

- 2. stk. 5 verður orðað soleiðis:

Arbeiðsgevaragjaldið og rentur eftir hesi lóg og innkrevjingarkostnaður av hesum kunnu krevjast inn við panting.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar:

Fyriliggandi uppskot til broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn inniheldur smávegis broytingar í innkrevjingarreglunum í lógini.

Sum lógin er orðað í dag, er tað bert arbeiðsgevaragjøldim og rentur av hesum, ið kunnu krevjast inn við panting. Hetta førir við sær óneyðugar trupulleikar og eyka kostnað í mun til innkrevjingina av eftirstøðum til grunnin, og verður tí skotið upp, at víðka pantiheimildina til eisini at fevna um møguligan innbeintingarkostnað.

1. viðgerð 16. apríl 1996. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 30. apríl 1996 legði fram soljóðandi

Á l i t

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 25. mars 1996 og beint í rættarnevndina eftir 1. viðgerð tann 16. apríl 1996.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Bjørn á Heygum, Sune Jacobsen, Marita Petersen, Signar á Brúnni, Lasse Klein og Ingeborg Vinther) tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja tað.

Minnilutin (Jógvan á Lakjuni) vísir á, at við hesum lógaruppskoti verður enn ein eykabyrða løgd á vinnulívið, sum frammanundan er niðurpínt av einum alt ov høgum kostnaðarstigi. Hetta er bara ein annar máti hjá tí almenna at økja um sínar inntøkur fyri at uppihalda einum almennum sektori, sum frammanundan er alt ov stórur. Minnilutin tekur tí ikki undir við uppskotinum.

2. viðgerð 7. mai 1996. §§ 1 og 2 samtyktar við 18-0-4. Samtykt at beina málið soleiðis samtykt til 3. viðgerð við 18-0-5 atkvøðum.

3. viðgerð 15. mai 1996. Málið endaliga samtykt við 19-1-5 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 86, 28. mai 1996.

F.L. j.nr. 1334-5/93.

99 Løgtingslóg um sosialar pensjónir o.a.

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Andrias Petersen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

Løgtingslóg um sosialar pensjónir o.a.

Kapittul 1

§ 1. Henda lóg um sosialar pensjónir er givin út sambært § 1, stk. 2, nr. 2 í ríkislóg nr. 315 frá 15. Mai 1995 um almannaveitingar í Føroyum.

§ 2. Pensjón eftir hesi lóg er fólkapensjón, fyritíðarpensjón, og viðbøtur eftir kapittul 2 og 11.

Vanligar treytir
Heimarættur, bústaður o.a.

§ 3. Rætturin til pensjón og avlamisveiting, sb. § 34, er treytaður av.

1) at tann, ið fær veiting, hevur danskan heimarætt ella er giftur við ella seinast hevur verið giftur við einum persóni við donskum heimarætti,
2) at tann, ið fær veiting, hevur fastan bústað í Føroyum ella hevur hýru við skipi heimahoyrandi í Føroyum, og
3) at tann, ið fær veiting, hevur havt fastan bústað í danska ríkinum í minsta lagi 3 ár frá fylta 15. árinum inntil fylta 67. árið.

Stk. 2. Samsvarandi reglum í sáttmálum við onnur lond kann landsstýrið áseta reglur um undantak fyri treytunum í stk. 1.

Stk. 3. Tá heilt serligar umstøður tala fyri tí, kann landsstýrið gera undantak frá regluni í stk. 1, nr. 2 fyri persónar, sum aftaná at hava fingið veitingar, búsetast í útlandinum.

Innvinnan av pensjón

§ 4. Rættur til fulla pensjón fyri persónar yvir 67 ár er treytaður av føstum bústaði í danska ríkinum í minsta lagi 40 ár.

Stk. 2. Er treytin fyri fullari pensjón eftir stk. 1 ikki lokin, verður pensjónin ásett eftir lutfallinum millum bústaðartíðina og 40 ár.

Stk. 3. Tá ein fyritíðarpensjonistur fer frá fyritíðarpensjón til fólkupensión við 67 ára aldur, verður pensjónin útgoldin við eins nógvum fjørutiundapartum, sum pensjónin higartil hevur verið útgoldin.

§ 5. Rættur til fulla pensjón fyri persónar undir 67 ár er treytaður av, at bústaðartíðin í danska ríkinum er í minsta lagi 4/5 av árunum frá tí fylta 15. árinum til dagfestingina fyri játtan av pensjón.

Stk. 2. Er treytin fyri tillutan av fullari pensjón eftir stk. 1 ikki lokin, verður pensjónin ásett eftir lutfallinum millum bústaðartíðina og 4/5 av tíðini frá tí fylta 15. árinum til dagfestingina fyri tillutan av pensjón. Tann útroknaði parturin av fullari pensjón verður lækkaður til nærmasta talið av fjørutiundapartum av fullari pensjón.

§ 6. Við útrokning av pensjón, ið verður veitt við einum tali av fjørutiundapartum av fullari pensjón eftir § 4, stk. 2 og § 5, stk. 2, verður fulla pensjónin, ásett eftir reglunum í kapittul 2, fyrst útroknað. Soleiðis útroknaða pensjónsupphæddin verður síðan lækkað við tí útroknaða talinum av fjørutiundapartum. Viðbøtur sambært §§ 30 og 31 verða tó ikki lækkaðar.

Uppgerð av bústaðartíð

§ 7. Tá ið bústaðartíðin verður gjørd upp eftir ásetingunum í § 3, stk. 1, nr. 3 og §§ 4 og 5 verður við bústað í danska ríkinum javnsett

1) hýra við føroyskum, grønlendskum ella donskum skipi,
2) uppihald uttanlands sum útsent umboð fyri eitt føroyskt, grønlendskt ella danskt almennt myndugleika,
3) uppihald uttanlands í samband við starv í føroyskum, grønlendskum ella donskum áhuga,
4) uppihald uttanlands í samband við starv á deild av eitt føroyskari, grønlendskari ella danskari fyritøku ella dóttirfelag, og
5) uppihald uttanlands við atliti til útbúgving.

§ 8. Í uppgerðini av bústaðartíðini verður einans roknað við bústaðartíðum frá tí fylta 15. árinum, har fyritíðarpensjón ikki er veitt, tó í mesta lagi til fylta

67. átið. Fleiri bústaðartíðarskeið verða samanløgd og samlaða bústaðartíðin verður lækkað til nærmasta heila talið av árum. Tó verða tær nevndu bústaðartíðirnar avrundaðar til nærmasta heila talið av mánaðum við útroknan av lutfallinum eftir § 5, stk. 2.

Kapittul 2
Veltingar til pensjonistar

Pensjónssløg og treytir fyri tillutan

§ 9. Sosialar pensjónir eru:

I. Fólkapensjón
II. Hægsta fyritíðarpensjón
II2) Miðal fyritíðarpensjón
II3) Lægsta fyritíðarpensjón

§ 10. Rætt til fólkapensjón hava persónar, sum hava fylt 67 ár.

§ 11. Fyritíðarpensjón kann tillutast persónum millum 18 og 67 ár.

§ 12. Hægsta fyritíðarpensjón kann tillutast persónum, sum hava fylt 18 ár, men sum ikki hava fylt 60 ár, tá umsóknin verður latin inn, ið, orsakað av likamligum ella sálarligum avlamni, mugu roknast sum varandi óarbeiðsførir í eini og hvørjari vinnu, ella sum einans hava smávegis eftir av arbeiðsføri.

§ 13. Miðal fyritíðarpensjón kann tillutast

1) persónum, sum hava fylt 18 ár, men sum ikki hava fylt 60 ár, tá umsóknin verður latin inn, hvørs arbeiðsføri, orsakað av likamligum ella sálarligum avlamni, varandi er minkað við í minsta lagi 2/3,

2) persónum yvir 60 ár, hvørs arbeiðsføri er minkað sum ásett í § 12, umframt

3) einkjum og einkjumonnum við uppihaldsskyldu fyri børnum undir 18 ár.

§ 14. Lægsta fyritíðarpensjón kann tillutast

1) persónum millum 18 og 67 ár, hvørs arbeiðføri, orsakað av likamligum ella sálarligum avlamni, varandi er minkað við í minsta lagi eini helvt, umframt

2) persónum millum 50 og 67 ár, tá viknandi heilsa, vantandi arbeiðsmøguleikar ella aðrar serligar umstøður tala fyri tí, og mett verður at viðkomandi hevur ein varandi forsorgartørv.

§ 15. Fyritíðarpensjón eftir § 12 og § 13, nr. 1 og 2 kann hvørki afturtakast ella broytast til hægri ella lægri pensión aftaná fylta 60. árið.

§ 16. Í metingini av í hvønn mun arbeiðsførið er minkað eftir §§ 12, 13, nr. 1 og 2 og 14, nr. 1 skal ætlast um

1) ta inntøku, sum viðkomandi verður mettur at kunna forvinna við einum arbeiði, sum svarar til hansara kreftir og førleikar, og sum við atliti til útbúgving og virksemi fyrr, kann verða kravt av honum, samanborið við ta inntøku, sum persónar við samsvarandi útbúgving vanliga kunnu forvinna í sama øki,

2) aldur, lívsstarv, bústað og arbeiðsmøguleikar, umframt líkindi fyri betran ella versnan av avlamninum,

3) slíkar aðrar umstøður, sum hildið verður í tí einstaka førinum, at dentur skal leggjast á í heildarmetingina av skerda arbeiðsførinum.

§ 17. Fyritíðarpensjón kann ikki tillutast persónum undir 60 ár, um møguleiki er fyri at útvega arbeiði ella at veita viðkomandi hjálp til at menna ella endurskapa arbeiðsførið við viðgerð, uppvenjing, útbúgving, umskúling ella øðrum fyriskipanum, sum ætlandi meira enn fyribils kunnu betra arbeiðsførið munandi.

§ 18. Rætturin til pensjón eftir § 13, nr. 3 heldur uppat við gifting, men verður, um treytirnar annars eru loknar, vunnin aftur aftaná umsókn, um hjúnarlagið heldur uppat, uttan mun til, hvussu leingi hetta hjúnalag hevur staðið við.

Stk. 2. Rætturin til pensjón heldur uppat við endan av tí mánaða, ein pensjonistur doyr.

Samanseting og útrokning av pensjónum

§ 19. Fólkapensjón er sett saman av grundupphædd og pensjónsviðbót.

§ 20. Hægsta fyritíðarpensjón er sett saman av grundupphædd, pensjóns-viðbót, fyritíðarviðbót og óarbeiðs-førisviðbót.

§ 21. Miðal fyritíðarpensjón er sett saman av grundupphædd, pensjóns-viðbót og fyritíðarviðbót.

Stk. 2. Fyritíðarviðbót til pensjón eftir § 13, nr. 3 verður varðveitt við hálvu upphæddini 1 ár aftaná at rætturin til hesa pensjón er mistur, tí viðkomandi ikki longur hevur børn undir 18 ár.

§ 22. Lægsta fyritíðarpensjón er sett saman av grundupphædd og pensjónsviðbót.

§ 23. Grundupphædd til fólkapensjón, óarbeiðsførisviðbót til hægsta fyritíðarpensjón og fyritíðarviðbót til fyritíðarpensjón eftir §§ 12 og 13, nr. 1 og 2 verða útgoldnar uttan mun til fíggjarligu viðurskiftini hjá tí, ið fær pensjón.

Stk. 2. Grundupphædd til fyritíðarpensjón, fyritíðarviðbót til pensjón eftir §§ 13, nr. 3 og 21, stk. 2 umframt pensjónsviðbót verða útroknaðar í mun til inntøku, sb. § 24.

Stk. 3. Pensjónsviðbót verður ikki útgoldin til ein pensionist, sum sambært § 3, stk. 3 fær pensión uttanlands.

§ 24. Grundupphædd til fyritíðarpensjón verður lækkað við 60% av inntøkugrundarlagnum eftir §§ 25-27.

Stk. 2. Fyritíðarviðbót til fyritíðarpensjón eftir §§ 13, nr. 3 og 21, stk. 2 verður lækkað við 60% í framhaldi av og eftir sama reglum sum lækkingin av grundupphæddini eftir stk. 1.

Stk. 3. Pensjónsviðbót verður lækkað við 15% fyri hvønn hjúnafelaga av inntøkuni eftir §§ 25-27, um bæði fáa pensjón, í øðrum førum við 30%. Pensjónsviðbót til giftan pensjonist verður, uttan mun til um tann eini ella báðir hjúnafelagarnir fáa pensjón, lækkað við grundarlag í inntøkuni hjá báðum hjúnafeløgunum tilsamans.

Stk. 4. Fyritíðarpensjón eftir § 13, nr. 3 og § 14 dettur burtur, tá hon gerst minni enn ein minstaupphædd, sb. § 54, stk. 1, nr.5 .

Inntøkugrundarlag

§ 25. Sum grundarlag fyri útrokning av grundupphædd til fyritíðarpensjón, fyritíðarviðbót til pensjón eftir § 13, nr. 3 og pensjónsviðbót verður nýtt tann seinasta, endaligt uppgjørda, persónliga skattskylduga inntøkan uttan ívísur skattligar frádráttir, við ískoyti fyri inntøkur av ogn, sb. stk. 2. Landsstýrið ásetur nærri reglur fyri, hvørjir skattligir frádráttir skulu takast við í útrokningini av inntøkuni.

Stk. 2. Í uppgerðini av ognarinntøkum verða roknaðar rentuinntøkur og annar vinningur av innistandandi, virðisbrøvum, útistandandi og tíðkutn við frádráti fyri rentuútreiðslur. Verður úrslitið av uppgerðini av ognarinntøkum negativt, verður rentuinntøkan sett til 0, áðrenn hon verður løgd aftrat inntøkuni eftir stk. 1. Fyri giftar persónar verður roknað við helvtini av samlaðu ognarinntøkuni fyri hvønn hjúnafelaga.

Stk. 3. Uppí inntøkuna eftir stk. 1 og 2 skulu ikki roknast sosialar pensjónir, herímillum sosial pensjón útgoldin í einum landi, sum sáttmáli er gjørdur við um pensjón, barnastyrk og sosialar veitingar við samsvarandi endamáli, umframt arbeiðsmarknaðareflirløn eftir løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn og líknandi.

Stk. 4. Aftarat tí í stk. 1-3 uppgjørda inntøkugrundarlagnum verður uppískoyti gjørt fyri útroknaða inntøku av ogn, sum pensionisturin og hjúnafelagi hansara við burturgeving ella við líknandi tiltøkum, hava verrað sína fíggjarligu støðu.

Stk. 5. Landsstýrið ásetur nærri reglur viðvíkjandi útrokning av inntøkugrundarlagnum eftir stk. 1-4.

§ 26. Við útrokning av grundupphædd og fyritíðarviðbót eftir § 24 verður tann eftir § 25 uppgjørda inntøkan lækkað við einum frádráti, sb. § 54, stk. 1, nr. 6.

Stk. 2. Við úttrokningina verður tann í stk. 1 nevndi frádráttur hækkaður við einum eyka frádráti fyri inntøkur av persónligum arbeiði, sb. § 54, stk. 1, nr. 7.

Stk. 3. Við útrokning av pensjónsviðbót eftir § 24 verður tann eftir § 25 uppgjørda inntøkan lækkað við einum frádráti, sb. § 54, stk. 1, nr. 8.

§ 27. Tann eftir §§ 25-27 uppgjørda inntøkan verður avrundað niðureftir til næmmasta upphædd, sum kann deilast við 100.

§ 28. Landsstýrið kann ásetta reglur um frádrátt fyri veitingar eftir hesi lóg fyri upphæddir, sum tann, ið fær veiting, hevur fingið í pensjón ella aðrari líknandi veiting sambæt útlendska lóggávu, í tí tíðarskeiði, sum veitingar verða útroknaðar eftir hesi lóg.

Viðbøtur o.a.

§ 29. Hevur avlatmi hjá einum fyritíðarpensjonisti eftir §§ 12, 13, nr. 1-2 og 14, nr. 1 við sær, at viðkomandi støðugt má hava persónliga hjálp frá øðrum, ella stavar avlatmi frá blindi ella nógv niðursettari sjón, verður ein hjálpar-viðbót veitt til fyritíðarpensjónina. Hevur avlatmi við sær tørv á varandi røkt ella umsjón, ið ger tað neyðugt, at annar persónur er støðugt hjáverandi, verður í staðin fyri hjálparviðbót veitt ein røktarviðbót.

Stk. 2. Hjálparviðbót og røktarviðbót verða ikki útgoldnar, um pensjonisturin fær stuðul sambæt lóg um samsýting fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima. Útgjaldingin verður tikin uppattur, tá ansingarstuðulin heldur uppat.

§ 30. Til fólka- og fyritíðarpensjón verður veitt ein barnaviðbót, tá pensjonisturin hevur uppihalds- ella gjaldsskyldu fyri børnum undir 18 ár.

Stk. 2. Hava fleiri pensjonistar uppihalds- ella gjaldsskyldu fyri sama barni, verður viðbót útgoldin til tann, sum tað er álagt at finda gjald til barnið, ella um gjald ikki er ásett, til tann sum einsamallur ella í størstan mun uppiheldur ella hevur uppihildið barninum.

Stk. 3. Barnaviðbót verður útgoldin við sama upphædd sum normalgjaldið eftir lóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v. II.

Stk. 4. Barnaviðbót verður ikki útgoldin í førum, sum nevnd eru niðanfyri:

1) um pensjonisturin beinleiðis fær gjald til uppihald barnsins,

2) um pensjonisturin fær gjald eftir kapitul 2 í lóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl. ella hevur rætt til eitt tílíkt gjald,

3) um barnið er uppihildið uttanfyri heimi eftir lóggávuni um ser- ella barnaforsorg.

Stk. 5. Viðbótin verður útgoldin eina ferð um mánaðan saman við pensjónini. Viðbótin er skattskyldug hjá barninum.

Stk. 6. Broyting hjá einum pensjonisti í barnatali undir 18 ár fær gildi frá 1. í mánaðinum aftaná broytingina.

§ 31. Til pensjonistar, sum hava serliga trong kor, kann Almannastovan veita persónligt ískoyti.

Stk. 2. Almannastovan kann avgera, at persónligt ískoyti eftir stk. 1 viðvíkjandi útreiðslum til egnan bústað, skal gjaldast aftur. Almannastovan kann avskriva aftargjaldskravið, tá tað, innanfyri eitt rimligt áramál aftaná at kravið er sett fram, verður mett, at ongin líggjarligur møguleiki er fyri at fremja kravið.

Stk. 3. Almannastovan kann harumframt veita stuðul til umsorgararbeiði fyri pensjonistar.

Stk. 4. Landsstýrið ásetur nærri reglur viðvíkjandi persónligum ískoytum til gjald av útreiðslum av sjúkraviðgerð, heilivági, tannviðgerð og líknandi, herímillum um egingjald.

Stk. 5. Landsstýrið ásetur nærri reglur um

1) veiting av persónligum ískoytum eftir stk. 1 og aftargjalding eftir stk. 2, og

2) stuðul til umsorgararbeiði eftir stk. 3.

Kapittul 3

Serligar reglur við umskiftl frá fyritíðarpensjón til fólkapensjón

§ 32. Persónar, sum fáa fyritíðarpensjón og avlatmisveiting, skifta uttan umsókn til fólkapensjón frá 1. í mánaðinum aftaná fylta 67. árið.

§ 33. Til fólkapensjonistar, sum skifta frá fyritíðarpensjón til fólkapensjón, og sum við umskiftið fingu hjálparviðbót ella røktarviðbót, verða hesar viðbøtur framhaldandi veittar.

Kapittul 4

Veitingar til ikki-pensionistar

§ 34. Persónar, sum hava slíka arbeiðsinntøku, at teir eftir domingini, sum er fyriskrivað í § 16, ikki hava rætt til fyritíðarpensjón, men hvørs avlatmi leknaliga dømt er so mikið álvarsligt, at teir vildu havi

rætt til pensjón eftir § 12 ella § 13, nr. 1 og 2, um teir ikki høvdu arbeiði, hava rætt til avlamisveiting, sb. § 54, stk. 1, nr. 11. Rætt til avlamisveiting hava eisini persónar millum 18 og 67 ár, sum, orsakað av álvarsligum hoyriskaða, hava stórar samskiftistrupulleikar.

Stk. 2. Persónar, sum fáa veiting eftir stk. 1, hava eisini rætt til hjálparviðbót og røktarviðbót eftir reglunum í § 29.

Kapittul 5

Umsókn, útgjalding o.a.

§ 35. Umsókn um veitingar eftir hesi lóg verða latnar Almannastovuni á oyðibløðum, sum verða útflyggjað av Almannastovuni.

Stk. 2. Almannastovan sendir umsóknina um fyritíðarpensjón eftir §§ 12, 13, nr. 1 og 2 og 14, nr. 1 við tilráðing víðari til Vanlukku-tryggingarráðið (Færøernes Ulykkes-forsikringsråd), sb. § 60. Við umsóknini skulu fylgja upplýsingar um arbeiðsviðurskifti og fíggjarlig viðurskifti umsøkjarans sum heild.

Stk. 3. Umsóknin skal innihalda tær neyðugu upplýsingarnar fyri dømingina av rættinum hjá viðkomandi til veitingar eftir lógini, umframt neyðug skjalprógv fyri upplýsingunum. Við umsóknini skal fylgja ein undir trúnaðartreytum undirskrivað váttan frá umsøkjaranum og møguligum hjúnafelag um, at innihaldið í umsóknini er í samsvari við sannleikan. Er umsøkjarin ikki førur fyri at útskriva eina skrivliga váttan, skal rættleikin av upplýsingunum í umsóknini verða váttaður av tveimum vitnum, sum hava neyvan kunnleika til viðurskiftini hjá umsøkjaranum.

Stk. 4. Tann, ið letur inn umsókn um fyritíðarpensjón grundað á heilsulig viðurskifti, hevur skyldu til, samstundis við umsóknini, at senda inn eina læknaváttan, sum verður orðað og send inn eftir nærri reglum, sum landsstýrið ásetur. Henda læknaváttan verður goldin sum fyritíðarpensjónsútreiðsla.

Stk. 5. Almannastovan kann taka avgerð ella reisa mál um játtan av veitingum eftir hesi lóg.

§ 36. Í samband við avgerðir um fyritíðarpensjón eftir hesi lóg, kann Vanlukkutryggingarráðið áleggja um-søkjaranum at viðvirka í lýsingini av málinum, millum annað við at lata seg kanna og viðgera av lækna ella innleggja til kanningar og viðgerð.

§ 37. Almannastovan og Vanlukkutryggingarráðið kunnu krevja skattamyndugleikar, sjúkrakassar, kommunalar myndugleikar, arbeiðsgevarar og onnur viðkomandi, herímillum sjúkrahús, viðgerðandi læknar o.o., ið hava kunnleika til viðurskiftini, eftir upplýsingum av týdningi fyri viðgerð av pensjónsmálum. Almennir myndugleikar skulu kostnaðarleyst útskriva váttanir og útskriftir av rættarprotokollum, inntøku- og ognarskrásetingum, sjúkrahúsjour-nalum og líknandi, umframt veita neyðuga hjálp til lýsing av málinum.

§ 38. Almannastovan skal senda fráboðan um umskifti frá fyritíðarpensjón til fólkapensjón í rímiligari tíð áðrenn viðkomandi pensjonistur verður 67 ár. Somuleiðis skulu fyritíðarpensjonistar sambært § 13, nr. 3 hava fráboðan um at pensjónin lækkar ella dettur burtur í rímiligari tíð áðrenn broytingina.

§ 39. Fyritíðarpensjón eftir §§ 12, 13, nr. 1 og 2 og 14, nr. 1 verður útgoldin frá tí degi, sum er uppgivin í avgerðini hjá ráðnum ella Den Sociale Ankestyrelse.

Stk. 2. Fyritíðarpensjón annars og fólkapensjón verður veitt frá tí degi, treytirnar eru loknar, tó í fyrsta lagi frá 1. í mánaðinum aftaná dagfestingina fyri móttøku av umsóknini.

Stk. 3. Verður samskipanarfrádráttur gjørdur í møguligari lænastumannaeftirløn, verður pensjónin tó veitt frá tí degi, samskipanarfrádrátturin verður gjørdur.

§ 40. Almannastovan kann útgjalda fyritíðarpensjón sum forskot, um umsøkjarin er í eini støðu, sum gevur honum rætt til fyribils kontanthjálp til uppibalds eftir ásetingunum í forsorgarlógini, tá umsókn um fyritíðarpensjón er latin til Vanlukkutryggingarráðið og mett verður sannlíkt, at pensjón verður játtað. Forskotið verður veitt innanfyri tær upphæddir, sum roknað verður við, at pensjónin kemur at verða.

Stk. 2. Um so er at umsøkjarin ikki fær rætt til eina pensjón, sum er eins stór og tann upphæddin, ið er útgoldin sum forskot, verður upphæddin ella avlopsupphæddin konterað sum hjálp uttan afturgjaldsskyldu eftir lóg um almenna forsorg. Upphæddin kann tó verða kravd afturgoldin, um umsøkjarin

hevur givið eyðsýnt skeivar upplýsingar um sínt fíggjarligu og persónligu viðurskifti.

§ 41. Pensjónin verður útgoldin frammanundan eina ferð um mánaðan.

Stk. 2. Flytur ein pensjonistur til aðra kommunu ella til annan bústað í sonu kommunu, skal hann geva Almannastovuni fráboðan um nýggja bústaðin.

Stk. 3. Landsstýrið ásetur, allaná samráðingar við donsku stjórnina, nærri reglur fyri, hvussu verður við pensjónini, tá ein persónur, sum fær pensjón eftir donskum reglum, flytir til Føroyar.

§ 42. Verður Almannastovan, til dømis gjøgnum fráboðanir frá landsstýrinum, kommunalum myndugleikum, avvarðandi hjá pensjonistinum ella øðrum, varug við, at ein pensjonistur ikki eigur at hava avgerðarrætt yvir pensjónini, tekur Almannastovan avgerð um, hvussu pensjónin skal útgjaldast. Almannastovan kann, um neyðugt, reisa mál um, at viðkomandi verður gjørdur ómyndugur.

Stk. 2. Landsstýrið ásetur nærri reglur fyri ásetingunum í stk. 1.

§ 43. Rætturin til pensjón hjá einum persóni, sum eftir galdandi reglum fyri sjúkrakassar hevur rætt til at vera limur í sjúkrakassa, er treytaður av, at viðkomandi søkir um upptøku sum njótandi limur og verður standandi sum slíkur, so leingi sum treytirnar fyri tí eru loknar.

Stk. 2. Eftir avtalu við sjúkrakassan á staðnum kann Almannastovan afturhalda eini upphædd av pensjónini, sum svarar til sjúkrakassalimagjaldið, ið verður útgoldið beinleiðis til sjúkrakassan.

Kapittul 6

Árlig ásetan, broytingar, afturtøku, o.a.

§ 44. Pensjónin verður áset av Almannastovuni hvønn tann 1. januar grundað á inntøkuna, uppgjørda eftir §§ 25-27.

Stk. 2. Fyrsta pensjónsútrokningin verður tó grundað á eina vøntaða árliga inntøku, um inntøkan hjá pensjonistinum framyvir, orsakað av at hann er givin at arbeiða, er farin niður í arbeiðstíð, fær tantastu-eftirløn ella av aðrari orsøk, vøntast varandi broytt.

Stk. 3. Pensjónin verður umroknað í árinum,

1) um inntøkan broytist meira enn fyribils og ein útrokning av pensjónini, grundað á vøntaðu inntøkuna framyvir, hevur við sær at pensjónsupphæddin broytist, ella
2) um broytingar hendar í teimum persóttligu viðurskiftunum, berímillum hjúnabandsstøðu, uppihaldarastøðu ella øðrum viðurskiftum, sum hava týdning fyri støddina av pensjónini.

Stk. 4. Um ein broytt inntøka framyvir er óviss at meta um, t.d. orsakað av skiftandi og stórum munum í lønarútgjaldingum, kann Almannastovan útrokna pensjónina einaferð um mánaðan, við grundarlag í tí av skattavaldinum dagførdu inntøkuni. Pensjónin skal í tílíkum førum eftirroknast í samband við árligu pensjónsumrokningina.

Stk. 5. Um ein broytt inntøka er grundað á broytingar í inntøku stavandi frá sjálvstøðugum virki ella aðrari ikki fyribils skrásettari inntøku, skal viðkomandi pensjonistur frá skattamyndugleikunum fáa til vega eina nýggja fyribils inntøkuásetan sum grundarlag fyri útrokning av pensjónini. Pensjónin verður eftirroknað, tá inntøkan viðkomandi ár er endaliga álíknað.

Stk. 6. Vísur tað seg við eftirútrokningini eftir stk. 4 og 5, at viðkomandi pensjonistur hevur fingið eina størri veiting enn hann við veruligu inntøkuni sum grundarlag hevði havt rætt til viðkomandi ár, verður ov nógv útgoldnað upphæddin kravd aftur, møguliga við mótrokning í pensjónini teir eftirfylgjandi mánaðarnar. Vísur tað seg, at útgjaldingin hevur verið minni enn tað, viðkomandi við veruligu inntøkuni sum grundarlag hevði rætt til, verður avloptsupphæddin útgoldin.

§ 45. Persónar, sum fáa veiting eftir hesi lóg, skulu boða Almannastovuni frá einihvørjari broyting í sínum viðurskiftum, sum ætlast at hava við sær, at veitingin lækkar ella fellur burtur.

§ 46. Hevur ein persónur, ið fær veiting, ikki hildið sína upplýsingarskyldu eftir § 45 ella móti betri vitan av órøttum fingið veiting, skal viðkomandi ella deyðsbúgv hansara gjalda aftur ta upphædd, sum er fingin av órøttum.

§ 47. Eru munandi broytingar hendar í viðurskiftum, sum hava týdning fyri rættin til fyritíðarpensjón,

skal málið takast upp til nýggja dømning.

§ 48. Almannastovan skal taka avgerð ella fyri Vanlukku-tryggingarráðnum reisa mál um afturtøku ella yvirflyting til aðra pensjón,

um ein fyritíðarpensjonistur hevur persónligar arbeiðsinntøkur, sum fara uppum eina upphædd svarandi til dupultu árligu grundupphæddina fyri støk, sb. tó § 16,

um arbeiðsførið er týðandi betrað ella versnað hjá einum fyritíðarpensjonisti, sb. §§ 12, 13, nr. 1 og 2, 14, nr. 1 og 16,

um týðandi broytingar eru farnar fram í viðurskiftum sum hava týdning fyri rættin til pensjón hjá einum fyritíðarpensjonisti, sb. §§ 13, nr. 3 og 14, nr. 2, ella

um broytingar eru farnar fram í viðurskiftum hjá einum persóni, sum fær avlamisveiting og hjálpar- ella røktarviðbót, sum gera, at roknast má við, at hann ikki longur lýkur treytirnar fyri at fáa slíka veiting.

Stk. 2. Teir í stk. 1 nevndu spurningar kunnu eisini reisast av pensjonistinum sjálvum.

§ 49. Fær ein pensjonistur uppihald á einum stovni fyri persónar við víttfevnandi likamligum ella sálarligum breki, sum er góðkendur eftir lóggávuna um almenna forsorg ella á samsvarandi almennum ella privatum stovni, verður pensjónin útgoldin honum í 6 mánaðar umframt innleggingarmánaðan, sb. tó § 42. Pensjónin dettur burtur fyri írestandi partin av innleggingartíðini. Fær pensjonisturin av nýggjum uppihald á nevndu stovnum, verður pensjón einans útgoldin inntil uppihaldstíðin tilsamans umframt innleggingarmánaðarnar er 6 mánaðar, roknað frá 1½ ári forút fyri innleggingina.

Stk. 2. Reglurnar í stk. 1 galda eisini fyri avlamisveiting. Hjálpar- og røktarviðbót detta burtur við endan av tí mánaða, sum kemur aftaná innleggingarmánaðan.

Stk. 3. Landsstýrið ásetur reglur fyri pensjónir og veitingar eftir hesi lóg, tá ein pensjónistur av einum av teimum undir stk. 1 nevndu stovnum verður settur í røkt í privatum heimum undir umsjón av einum stovni og fyri hjálpar- og røktarviðbót, um serligar stuðulsfyriskipanir í heiminum hjá pensjonistinum verða settar í verk av Almannastovuni.

Stk. 4. Við innlegging á vanligt sjúkrahús og líknandi eru ásetingarnar í stk. 2, 2. pkt. somuleiðis galdandi.

Stk. 5. Um ein pensjonistur má metast sum røktarsjúklingur ella hann annars verður mettur at vera óegnaður til varandi útskriving frá einum vanligum sjúkrahúsi, uttan at avgerð er tikin um uppihald á stovni, kann Almannastovan avgera, at pensjónin aftaná 6 mánaðars innleggingartíð einans verður útgoldin við eini upphædd svarandi til upphædd til persónligan tørv, sb. § 50, stk. 1, írestandi partin av innleggingartíðini.

Stk. 6. Ásetingarnar í stk. 1 og stk. 2 eru somuleiðis galdandi fyri pensjonistar, sum sita revsing ella eru undir øðrum frælsisskerjandi fyriskipanum sambært dóm. Tíðin, sum viðkomandi hevur verið varhaldsfongslaður, verður drigin frá í omanfyri nevnda tíðarskeiði.

Stk. 7. Landsstýrið ásetur reglur fyri, hvussu verður við pensjónini og líknandi, tá viðkomandi verður fær uppihald á stovnum o.l., ið eru umfataðir av lóg um almenna forsorg, har reglur ikki í lógini eru ásettar um nýtslu av pensjónini og veitingunum.

§ 50. Hjá persónum, sum fáa varandi uppihald á góðkendum røktarheimum og ellisheimum, fellur pensjónin burtur 1. í mánaðinum aftaná upptøkuna. Ein upphædd verður tó varðveitt til rindan av útreiðslum til persónliga tørv pensjonistsins. Hjá persónum undir 60 ár verður upphæddin til persónligan tørv hækkað við 20 %. Sb. § 54, stk. 1, nr. 12.

Stk. 2. Persónar, sum hava inntøku, ið ikki stavar frá sosialari pensjón eftir hesi lóg, skulu av inntøkuni rinda eitt gjald fyri uppihaldið. Gjaldið verður ásett til hægst 50% av inntøkuni, uppgjørda sum ásett í § 25, sb. tó § 44, stk. 2. Útroknaða gjaldið kann ikki fara uppum fullu útreiðsluna av uppihaldinum hjá pensjonistinum sambært tann seinasta, endaligt uppgjørda roknskapin fyri heimið. Heldur ikki kann gjaldið fara uppum eina upphædd, sum svarar til munin millum inntøkuna og tann skatt, sum er goldin av henni viðkomandi ár.

Stk. 3. Í uppgerðini av inntøkuni verður sæð burtur frá inntøku, stavandi frá persónligum arbeiði undir uppihaldinum á heiminum, um henda inntøka er minni enn dupulta upphæddin eftir stk. 1.

Stk. 4. Landsstýrið ásetur reglur fyri gjald fyri uppihaldið, tá ein pensjonistur hevur fyribils uppihald á einum røktar- og ellisheimi.

Stk. 5. Gjøld fyri uppihald á røktar- og ellisheimi fáa gildi við endan av tí mánaða, sum kemur aftaná upptøku-mánaðan.

Stk. 6. Føroya Gjaldsstova krevur inn gjøld fyri uppihald á røktar- og ellisheimum.

Stk. 7 Landsstýrið kann í samband við royndarskipanir avgera, at undantak kann gerast fyri ásetingina í stk. 1 um at pensjónin fellur burtur. Í slíkum førum ásetur landsstýrið nærri reglur um gjald fyri uppihald o.a., umframt hvussu leingi royndarskipanin kann halda fram.

§ 51. Hevur ein persónur, sum, eftir reglunum í § 50, stk. 2, skal gjalda fyri uppihaldið, uppihaldsskyldu fyri einum hjúnafelaga, sum ikki hevur uppihald á røktarheimi, ellisheimi ella líknandi, skulu gjaldsreglurnar ikki nýtast fyrrenn tryggjað er hjúnafelagnum eina uppihaldsupphædd, sum hevur við sær, at livikor familjunar bigartil ikki versna.

Stk. 2. Hevur persónur, hvørs pensjón fellur burtur eftir reglunum í § 49, stk. 1 og 5 og § 50, stk. 1 og 4 uppihalds- ella gjaldsskyldu fyri børnum undir 18 ár, verður barnaviðbót útgoldin undir somu treytum, sum ásett í § 30.

Stk. 3. Hevur hjúnafelagin hjá einum persóni, ið hevur varandi uppihald á røktar- og ellisheimi, sb § 50, stk. 1, inntøkur, sum eru hægri enn uppihaldsupphæddin eftir stk. 1, kann Almannastovan krevja gjald sambært ásetingunum í kapittul 1 í lóg um almenna forsorg.

Stk. 3. Landsstýrið ásetur nærri reglur fyri ásetan av uppihaldsupphædd eftir stk. 1 og møguligum gjaldi eftir stk. 3.

§ 52. Krøv um veitingar eftir hesi lóg kunnu ikki gerast til mál fyri úttøku ella aðrari rættarsókn. Avtalur um tílík krøv eru ógildugar.

Stk. 2 Krøv um skatt til Landskassan og kommunurnar kunnu tó, eftir umstøðunum, fremjast í samsvari við tær reglur, sum annars galda fyri tílík krøv.

Stk. 3. Krøv um ov nógv útgoldna pensjón kunnu mótroknast, tá talan er um upphæddir, sum eru útgoldnar út frá skeivum upplýsingum frá pensjonistinum.

Stk. 4. Krøv um ov nógv útgoldna pensjón, sum stava frá ov stórum útgjaldi til ein pensjonist í tíðini frá tillutingardag til útgjaldingardag fyri pensjón hjá hjúnafelaga hansara, kunnu mótroknast í eftirgjaldinum hjá hjúnafelagnum.

§ 53. Doyr ein giftur pensjonistur, og hava bæði hann og hjúnafelagin fingið pensjón, hevur eftirsitandi hjúnafelagin rætt til at fáa pensjónina hjá báðum tilsamans í 3 mánaðar frá endanum av tí mánaða, pensjonisturin doyr.

Kapittul 7

Upphæddir og javning

§ 54. Í ásetan av pensjón o.ø. eftir hesi lóg verða upphæddirnar niðanfyri nýttar:

1) Grundupphædd eftir §§ 19-22 er 37.968 kr. um árið, um hjúnafelagin eisini fær fólka- ella fyritíðarpensjón og 47.784 kr. um árið í øðrum førum.

2) Pensjónsviðbót eftir § 19-22 er 7.008 kr. um árið, um hjúnafelagin eisini fær fólka- ella fyritíðarpensjón og 8.820 kr. í øðrum førum.

3) Fyritíðarviðbót eftir §§ 20 og 21 er 19.068 kr. um árið, um hjúnafelagin eisini fær fyritíðarviðbót ella avlamisveiting og 22.260 kr. um árið í øðrum førum.

4) Óarbeiðsførisviðbót eftir § 20 er 22.320 kr. um árið, um hjúnafelagin eisini fær óarbeiðsførisviðbót og 30.852 kr. um árið í øðrum førum.

5) Minstaupphædd eftir § 24, stk. 4 er 945 kr um árið.

6) Frádráttur eftir § 26, stk. 1 er 24.100 kr. um árið.

7) Eyka frádráttur fyri arbeiðs-inntøkur eftir § 26, stk. 2 er 14.900 kr. um árið.

8) Frádráttur eftir § 26, stk. 3 er 17.800 kr. um árið fyri hjún tilsamans og 12.100 kr. fyri stakar persónar.

9) Hjálparviðbót eftir § 29, stk. 1, 1. pkt. er 22.260 kr. um árið.

10) Røktarviðbót eftir § 29, stk. 1, 2. pkt. er 44.412 kr. um árið.

11) Avlamisveiting eftir § 34, stk. 1 er 17.412 kr um árið, um hjúnafelagin eisini fær avlamisveiting

ella fyritíðar-viðbót og 21.432 kr. um árið í øðrum førum.

12) Upphædd til persónligan tørv eftir § 50 stk. 1 er 7.512 kr. um árið fyri persónar yvir 60 ár, fyri persónar undir 60 ár er upphæddin 9.014 kr. um árið (7.512 kr við 20%'s áskoyti).

Stk. 2. Í ásetan av pensjónini verður ein giftur persónur javnsettur við ein einsamallan, um samlívið er slitið við sundurlesing.

Stk. 3. Tær í stk. 1 ásettu upphæddirnar verða javnaðar eftir reglum, ásettum í serligari løgtingslóg.

Kapittul 8
Kærurættur

§ 55. Kærur um avgerðir, sum Almannastovan hevur tikið kunnu kærast til Kærunevndina í Almannamálum.

Stk. 2. Kærur til Kærunevndina verða sendar inn áðrenn 4 vikur aftaná at kæraran hevur fingið fráboðan um avgerðina.

Stk. 3. Kærunevndin kann síggja burtur frá kærufreistini, tá serligar grundir eru fyri tí.

§ 56. Avgerðir hjá Vanlukku-tryggingarráðnum sambæn hesi lóg kunnu kærast til Den Sociale Ankestyrelse.

Stk. 2. Kærur til Den Sociale Ankestyrelse verða sendar inn áðrenn 3 mánaðar aftaná at kæraran hevur fingið fráboðan um avgerðina.

Stk. 3. Den Sociale Ankestyrelse kann síggja burtur frá kærufreistini, tá serligar grundir eru fyri tí. Avgerðir um hetta verða tiknar av stjóranum fyri Den Sociale Ankestyrelse.

Kapittul 9
Fyrisiting

§ 57. Almannastovan fyrisitur hesa lóg, tá annað ikki er ásett í lógini.

§ 58. Toll & Skattstova Føroya skal tryggja, at upplýsingar um inntøku- og ognarviðurskifti eru tøkar í nýtiligum formi fyri viðgerðina av pensjónsmálum, umframt stuðla Almannastovuni í fremjan av reglunum í §§ 25 og 44.

§ 59. Kommunalir myndugleikar hava, eftir áheitan frá Almannastovuni og Vanlukku-tryggingarráðnum, skyldu til at lata upplýsingar til greiðslu av einum máli, tá avgerðin er treytað av upplýsingum um viðurskifti, sum krevja kunnleika til viðurskifti á staðnum.

§ 60. Vanlukkutryggingarráðið tekur avgerð um tilhitan, broyting og afturtøku av fyritíðarpensjón eftir §§ 12, 13, nr. 1 og 2 og 14, nr. 1, viðbótum eftir § 29 og avlanisveiting eftir § 34, umframt nær treytirnar fyri játtan, broyting og afturtøka eru loknar.

Stk. 2 Ráðið kann avgera, at eitt mál skal takast uppaftur til kanningar seinni. Hesin dagur verður ásettur av ráðnum.

Stk. 3. Ráðið kann avgera, at ein pensjón í sambund við afturtøku, skal takast innaftur stigvíst yvir í mesta lagi 12 mánaðar. Harumframt kann ráðið, tá umstøðurnar tala fyri tí, avgera at rætturin til pensjón fyribils, tó hagst í 3 ár, skal vera hvílandi.

Stk. 4. Ráðið kann áleggja einum umsøkjara um fyritíðarpensjón at møta í Ráðnum at geva frágreiðing. Harumframt kann ráðið, grundað á móttiknað frágreiðing, áleggja einum fyritíðarpensjonisti at møta í Ráðnum at geva frágreiðing.

Stk. 5. Møguligur ferðakostnaður, sum stendst av at møta í Ráðnum og tann partur av útreiðslum til viðgerð, sb. § 36, sum sjúkrakassin ikki hevur skyldu til at gjalda, verða goldnar av Ráðnum, eins og læknavátnanir, sum eru umbidnar av ráðnum, verða goldnar av hesum.

Stk. 6. Ráðið kann avgera, at málið lettur burtur ella pensjón verður tikin aftur í førum, har ein persónur ikki virkar við í neyðugum kanningum, sb. § 36, uppvenjing ella øðrum fyriskipanum, sum ætlast at hava við sær munandi betran av arbeiðsførinum.

Stk. 7. Ráðið hevur heimild til at senda ein ella fleiri sakkøn at ítinna eftirlit á staðnum við atlíti til arbeiðsførið ella at kalla fyritíðarpensionistar inn til eftirlit. Durvur ein pensjonistur kanning ráðsins, kann formaðurin, tá hann metir sannlíkt, at ein nýggj avgerð í málinum vil hava við sær, at pensjónin verður tikin aftur, fyribils steðga útgjaldinginum. Ráðið skal í slíkum førum taka avgerð skjótast møguligt. Útreiðslur til eftirlit verða goldnar av

Ráðnum.

Stk. 8. Reglur um virkisskipanina fyri Vanlukku-tryggingarráðið í málum um fyritíðarpensjón o.a. eftir hesi lóg verða ásettar av Landsstýrinum í eina virkisskrá eftir uppskoti frá ráðnum.

Stk. 9. Fyri virksemi sítt eftir hesi lóg fáa limir ráðsins eina samsýning. Útreiðslurnar av viðgerð ráðsins av máluru eftir hesi lóg, verða goldnar av heimastýrinum, meðan útreiðslurnar av viðgerðini hjá Den Sociale Ankestyrelse verða goldnar av statinum.

Stk. 10. Ráðið innsendur árliga til Landsstýrið og Den Sociale Ankestyrelse frágreiðing um virksemi sítt eftir hesi lóg.

Stk. 11. Ráðið boðar, samstandis við fráboðan til pensjonistin, Almannastovuni frá framhaldandi og endaligum avgerðum í tí einstaka málinum.

§ 61. Landsstýrið ásetur gjald fyri tær læknaváttanir, sum vanliga verða nýttar í viðgerðini av málum sambært hesi lóg.

§ 62. Landsstýrið ásetur nærri reglur um fremjan av hesi lóg, berðmillum um útrokning og útgjalding av pensjónum. Landsstýrið sendir harumfram út neyðuga leiðbeining.

Stk. 2. Landsstýrið kann avgera, at heimildirnar hjá Vanlukku-tryggingarráðnum og Almanna-stovuni at játta, afturtaka og broyta pensjón o.a. sambært hesi lóg, kunnu flytast til eitt ráð, ið verður upprætlað til endamálið.

Kapittul 10
Figging

§ 63. Útreiðslur sambært hesi lóg verða goldnar sambært løgtingslóg um býtið av almannaútreiðslunum v.m.

Kapittul 11
Reglur um gildiskomu og skiftisreglur

§ 64. Ríkislóg nr. 58 frá 15. mars 1967 fyri Føroyar um fólkapensjón, sb. lógarkunngerð nr. 103 frá 2. marts 1988, sum seinast broytt við Lóg nr. 1131 frá 21. Desember 1994, ríkislóg nr. 55 frá 15. mars 1967 fyri Føroyar um avlanispensjón o.a, sb. lógarkunngerð nr. 101 frá 2. mars 1988, sum seinast broytt við Lóg nr. 1131 frá 21. Desember 1994, §§ 27-31 um einkjupensjón í ríkislóg nr. 56 frá 15. mars 1967 fyri Føroyar um almenna forsorg, sb. lógarkunngerð Almannamálaráðsins nr. 100 frá 2. mars 1988 og løgtingslóg nr. 36 frá 4. mai 1977 um uppiskoytisveiting til einkjur, sum broytt við løgtingslóg nr. 120 frá 29. desember 1983, verða settar úr gildi, tá henda lóg tær gildi.

§ 65. Landsstýrið avger, hvørjar fyrisitingarligar forskriftir, ið eru útskrivaðar eftir eldri lógum, framhaldandi skulu hava gildi aftaná at henda lóg er sett í gildi.

§ 66. Persónar, sum til tann 1. juli 1997 høvdu rætt til hægstu, miðal og lægstu avlanispensjón eftir § 3 í avlanispensjónslógini, hava framyvir rætt til hægstu, miðal og lægstu fyritíðarpensjón eftir ávikavíst § 12, 13, nr. 1 og 2 og 14, nr. 1 í hesi lóg. Persónar, sum tann 1. juli 1997 høvdu rætt til avlanisveiting eftir § 16 í avlanispensjónslógini, hava framyvir rætt til avlanisveiting eftir § 34 í hesi lóg. Persónar, sum til tann 1. juli 1997 høvdu rætt til hjálpar-viðbót og øktarviðbót eftir § 11 í avlanispensjónslógini ella § 16 í fólkapensjónslógini, fara yvir til sama veitingar eftir ávikavíst § 29 og § 32 í hesi lóg.

Stk. 2. Kvinnur, sum til tann 1. juli 1997 høvdu rætt til einkjupensjón eftir § 27, stk. 1 í forsorgarlógini hava framyvir rætt til miðal fyritíðarpensjón eftir § 13, nr. 3 í hesi lóg. Kvinnur, sum til tann 1. juli 1997 høvdu rætt til pensjón eftir § 27, stk. 2 í forsorgarlógini, hava framyvir rætt til lægstu fyritíðarpensjón eftir § 14, nr. 2 í hesi lóg.

Stk. 3. Persónar, sum til tann 1. juli 1997 høvdu rætt til fólkapensjón eftir § 2, stk. 1, nr. 1 í fólkapensjónslógini, hava framyvir rætt til fólkapensjón eftir § 10 í hesi lóg. Persónar, sum til tann 1. juli 1997 høvdu rætt til fólkapensjón eftir § 2, stk. 1, nr. 2-4, hava framyvir rætt til lægstu fyritíðarpensjón eftir § 14, nr. 2 í hesi lóg.

Stk. 4. Pensjónin verður útgoldin við sama tali av fjørutíundapartum av fullari pensjón, sum hígartil. Tó skulu ásetingarnar í kapittul 6 nýtast. Fyri persónar umfataðir av stk. 2 og 3 verða ásetingarnar í § 47 og 48 tó ikki nýttar.

§ 67. Uttan tum til ásetingarnar í §§ 4-6 hava persónar við danskum heimarætti, ið eru føddir í 1938 ella fyrr, rætt til fulla fólkapensjón, um viðkomandi seinasta árið, áðrenn umsókn um pensjón er latin

inn, hevur havt fastan bústað í danska ríkinum, ella kann javnsetast við eina slíkan, sb. § 7, nr. 1-5.

§ 68. Persónar, sum innan 1. januar 1993 eftir reglunum í § 9 í fólkapensjónslógini, sum broytt við § 3 í lóg nr. 393 frá 20. mai 1992, hava útsett ella áðrenn hava kunna útsett áheitan um fólkapensjón, varðveita rættin til sonu viðbót, sum hígartil er útgoldin viðkomandi við niðanfyri nevndu upphæddum:

Hjún, tá bæði lúka treytirnar fyri at fáa pensjón:
Kr. um árið við útsetan til hin eldri hjúnafelagin fyltt
70 ár.....3.552
72 ár og seinni 5.436

Einsamøll umfram hjún, tá bert tann eini hjúnafelagin lýkur treytirnar:
Kr. um árið við útsetan til fylta
70. árið.....2.424
72. árið og seinni 3.516

Einsamallar kvinnur:
Kr. um árið við útsetan til fylta
65. árið 792
67. árið 1.716

§ 69. Persónar, sum til tann 1. juli 1997 eftir reglunum í § 10 í fólkapensjónslógini, sb. lógarkunngerð nr. 103 frá 2. marts 1988, sum seinast broytt við lóg nr. 1131 frá 21. desember 1994, hevdu rett til aldursviðbót, varðveita hesa viðbót við sonu upphæddi sum hígartil er útgoldin við niðanfyri nevndu upphæddum:

Kr. um árið til hjún, tá bæði høvdu fylt
80 ár: 3.132
Kr. um árið til hjún, tá tann eini hevði fylt 80 ár og hin fekk fólka-pensjón.....2.088

Kr. um árið til hjún, tá tann eini hevði fylt 80 ár og hin fekk lægstu av-lamispensjón 3.156

Kr. um árið til hjún, tá tann eini hevði fylt 80 ár og hin fekk miðal ella hægstu avlamispensjón
.....2.628

Kr. um árið til einsamallir persónar, sum høvdu fylt 80 ár, ella giftar persónar, sum høvdu fylt 80 ár, og hjúnafelagin ikki fekk pensjón: 3.936

§ 70. Pensjonistar, sum til tann 1. juli 1997 eftir § 16 í fólkapensjónslógini, høvdu rætt til avlamisískoyti, varðveita hetta ískoytið. Ískoytið er 4.716 kr. um árið.

§ 71. Persónar, sum til tann 1. _ 199_ eftir § 3, stk. 4 í avlamis-pensjónslógini, høvdu rætt til lægstu avlamispensjón, og sum, orsakað av inntøku útyvir pensjónina, einans fingu avlamisviðbót, varðveita eina skiftisupphædd av sonu stødd sum hígartil útgoldna avlamisviðbótin, um teir ikki tann 1. __ 199_ eftir nýggju reglunum hava rætt til grundupphædd og pensjónsviðbót við í minsta lagi sonu upphædd.

§ 72. Lógin fer gildi tann 1. juli 1997.

I. ALMENNAR VIÐMERKINGAR

1. INNGANGUR

Galdandi reglur um pensjónir finnast í fólkatingslógunum fyri Føroyar um

1) *fólkapensjón* (sb. lógarkunngerð sosialmálaráðsins nr. 103 frá 2. mars 1988, sum seinast broytt við lóg nr. 1131 frá 21 des. 1994)
2) *avlamispensjón v.m.* (sb. lógarkunngerð sosialmálaráðsins nr. 101 frá 2. mars 1988, sum seinast broytt við lóg nr. 1131 frá 21 des. 1994)
3) almenna forsorg, §§ 27-31, *einkjupensjón og pensjón til einsamallar kvinnur* frá 50 ár (sb. lógarkunngerð sosialmálaráðsins nr. 100 frá 2. mars 1988, sum seinast broytt við lóg nr. 393 frá 22. juni 1993)

umfram í løgtingslóg um
4) *uppiskoytisveiting* til einkjur (sb. løgtingslóg nr. 36 frá 4. mai 1977, sum broytt við løgtingslóg nr. 120 frá 29. desember 1983)

Sum kunnugt høvdu grannskoðanarfrágreiðingarnar fyri almanna-útreiðslurnar við sær, at allur stuðulin úr statskassanum frá 1. juli 1993 varð undagdur frá eini endurgjaldsskipan til heildarveiting. Samstundis varð tann 6. apríl 1994 avtalað, at rammulóg skuldi gerast fyri sosiala økið.

Við fólkatingslóg nr. 315 frá 15. mai 1995 um almannaveitingar í Føroyum - rammulógini - verður álagt og heimilað føroyska heimastýrinum at gjøgnumføra fyriskipanir fyri í rímiligan mun at fyribyrgja og hetta um sosialar trupulleikar og at áseta reglur á almannaøkinum. Fyriskipanirnar skulu m.a. fevna um eina fólka- og fyritíðarpensión, sí § 1. stk. 2, nr. 2 í áðurnevndu lóg.

Lógin hevur við sær, at so hvørt sum heimastýrið útfyllir rammulógina, hevur landsstýrið eisini ta ábyrgd, sum áður lá hjá Almannamálaráðnum, at hava eftirlit við teim reglum, sum løgtingið ásetur, bæði inni-haldsliga og viðvíkjandi umsitingini av teimum.

Til nýggjar løgtingslógir eru settar í gildi, verða tær dansku fólkatingslógirnar verandi í gildi. So leingi hesar dansku lógir framvegis eru í gildi í Føroyum, er tað eisini almannamálaráðið, ið hevur ábyrgdina á økinum. Avtala er gjørd millum landsstýrið og dansku stjórnina um arbeiðsætlan fyri lógararbeiðið, sum sigur, at rammulógin skal vera útfylt í 1997. T.v.s. at løgtingslógir tá eru samtyktar á øllum tí sosiala økinum (sí pkt. 5 í felagsyvirlýsingini frá fundinum millum landsstýrið og stjórnina frá 3. nov. 1995 og attan um útfyllandi lóggávu fyri sosial- og heilsuøki, ber endurgivið úr uppskotinum til lóg um tilskot til Føroya heimastýrið fyri árini 1996-98, sí fylgisskjal 1).

Ynski um endurskoðan av almannalóggávuni hevur ofta verið framm í Føroyum, bæði frá politiskari og umsitingarligari síðu. Landsstýrið hevur tvær reisur - í 1989 og 1992 - sett nevndir at endurskoða almannalóggávuna, men er arbeiðið steðgað upp í báðum førum. Í fyrru nevndini í samband við val í úrtíð. Seinna nevndin fór frá vísandi til nýggju støðuna, sum hevði tikið seg upp við danska kravinum í 1993 um umlegging av stuðulsskipanini frá endurgjaldsskipan til heildarveiting.

Arbeiðssetningurin hjá báðum nevndunum var at endurskoða alla almannalóggávuna og at smíða uppskot, sum gera lóggávuna einfaldari, meira nútímans og tillagað til føroyskar fyritreytar heldur enn verandi hefting at dansk um siðum, stovnum og orðingum.

Í báðum nevndum varð byrjað við pensjónslógunum. Fyrra nevndin kom nakað áleiðis við arbeiðnum, og stava nakrar av broytingunum, sum verða skotnar upp her, frá semjunt í tí nevndini.

Innanfyri tann tíðarkarm, sum er avtalaður fyri útfylling av rammulógini, ber ikki til at gera uppskot til meira grundleggjandi ábøtur. Men tað ber til innanfyri karmin at broyta skipanina soleiðis, at hon gerst meira nútímans, einfaldari, umsitingarliga meira rationell og í størri mun lagað til aðrar fyriskipanir, herímillum skipanir, sum umsitingin av pensjónslógunum beintleiðis er heft at. Fyriliggjandi uppskot er tilevnað við útgangsstøðið í hesum.

1.1. Broytingar í pensjónslógunum eftir fyriliggjandi uppskoti - ein samandráttur:

1. Galdandi lógir um pensjónir eru samanskrivaðar í eina lóg umfatandi eina fólkapensjón og eina fyritíðarpensjón í trimum stigum, við hesum realitetsbroytingum:
a) pensjón verður ikki longur játtað til persónar undir 18 ár,
b) vanligi pensjónsaldurin verður 67 ár, eisini fyri einsamallar kvinnur og kvinnur, sum eru giftar við pensjonistum; tó er møguligt hjá øllum at søkja fyritíðarpensjón grundað á heilsu-, arbeiðs- ella aðrar serligar umstøður frá 50 ára aldri,
c) fyritreytin fyri at fáa pensjón, áðrenn umsøkjarin er 60 ár, er fyri allar pensjónir, og ikki sum nú. einans fyri avlamispensjón, at tað ikki hevur verið møguligt at skaffa arbeiði ella at menna vinnuførleikan hjá viðkomandi; pensjón er sostatt einasta forsorgaralternativ,
d) lægsta avlamispensjón er hækkað og broytt soleiðis, at hon í upphædd og viðgerð verður hin sama sum aðrar fyritíðarpensjónir á fólkapensjónsstøði,
e) í øllum fyritíðarpensjónum, og ikki einans í pensjónum, sum eru grundaðar á avlanni burturav, verður ein eyka frádráttur gjørdur fyri inntøkur av arbeiði, áðrenn pensjónin verður lækkað, og

Ó ásetingarnar um hjúnarbands-, sjúkrakassa- og aldursviðbøtur verða settar úr gildi fyri tey, sum framyvir koma at fáa pensjón, men verður pensjónsviðbótin hækkað við verandi sjúkrakassaviðbót; aldursviðbótin verður framhaldandi, við skiftisreglu, varðveitt fyri tey, sum fáa hana í dag. Sí s. 22-26.

2. Frádráttartría inntøkuupphæddin fyri javning av pensjónini verður samanlagd við útrokningarfrádráttinum, soleiðis at hesar báðar upphæddir tilsamans vera til *ein* frádrátt í inntøkuni í staðin. Broytingin hevur onga ávirkan á pensjónsupphæddina. Sí s. 26-27.

3. Ásetan av inntøkugrundarlagnum verður nágreina og gjørt einfaldari við tillaging til skattskyldugu inntøkunt og inntøkum av fíggjarognum, sum verða skrásettar av skattamyndugleikunum, umfram at reglurnar um ískoyti, sum í dag skulu gerast í inntøkuni fyri samskipanarfrádrátt, barnapengar ítyvir normalgjaldið og naturaliuinntøkur, verða settar úr gildi. Sí s. 27-32.

4. Álagt verður skattamyndugleikunum at tryggja, at tann parturin av umsitingini av pensjónslógini, sum er heftur at inntøkuskrásetingum, kann fremjast. Sí s. 32.

5. Reglan um avleiðingina fyri pensjónsútrokningina av burturgeving og "ødselt og uordentligt levned" verður broytt soleiðis, at tað einans er burturgeving og líknandi, t.v.s. gávur, arvaforskot o.t., sum framyvir skulu hava avleiðingar fyri útrokningina. Sí s. 32.

6. 20%'s frádráttur í pensjónini fyri endugjøld fyri avlarmi verður strikaður. Sí s. 33.

7. Heimilað verður landsstýrinum at gera fastar reglur fyri játtan av persónligum ískoyti til ávís, ofta fyrikomandi. Sí s. 34.

8. Somatiskir røktarsjúklingar verða javnsettir við psykiatriskar sjúklingar, tá tað kemur til avleiðingar fyri pensjónina í samband við longrivarandi innlegging á sjúkrahús. Sí s. 34.

9. Gjald fyri stovnsuppihald verður minkað frá 60 til 50% av inntøkuni, burturdømi parturin av pensjónini skal ikki takast við í útrokningini av gjaldinum, tryggjað verður at gjaldið og skatturin, ið er goldin av inntøkuni, ikki verður hægri enn faktiska inntøkan og staðfest verður, hvør inntøkan er, sum gjaldið skal útroknast eftir. Harumframt verður heimilað landsstýrinum í samband við royndarskipanir at avgera, at pensjónin kann útgjaldast í samband við uppihald á røktar- og ellisheimum. Sí s. 34-36.

10. Ávísir fyrisitingarmyndugleikar, sum áður hava verið við í viðgerðini av pensjónum, skulu ikki longur vera við, meðan aðrir fáa nýggjar uppgávur. Vanlukkutryggingarráðið heldur fram sum avgerðarmyndugleiki fyri avlamistreytaður fyritíðarpensjónir, annars hevur Almannastovan fyrisitingina um hendir. Kommunalir myndugleikar hava skyldu at láta upplýsingar, sum krevja staðkunnleika. Sýslumenn og fútí fara úr skipanini og landsstýrið úr viðgerðini av einstaklingamálum. Sí s. 36-37.

11. Heimilað verður landsstýrinum at flyta heimildirnar hjá Almannastovuni og Vanlukkutryggingarráðnum viðvíkjandi tillutan av pensjón til eitt ráð, upprættað til endamálið. Sí s. 37.

12. Minsta útgjaldingarupphæddin í fyritíðarpensjón, sum kann detta burtur, tí allir partar av pensjónini eru heftir at inntøku, verður hækkað, soleiðis at samsvar er millum hesa og ásetingarnar um at pensjónin verður útgoldin við fjørituindapartum.

Aðrar broytingar eru redaktionellar, sum avleiðing av samanskrivingini og umskipanini av lógunum, umfram broytingum til meira nútímans málbrúk.

Ásett er í lógini, at Den Sociale Ankestyrelse í Danmark, hóast hetta er ein løgtingslóg og ongin ásetting eru uttan tað í rammulógini, verður verandi kærustovnur fyri avgerðir, sum verða tiknar av Vanlukkutryggingarráðnum. Almannamálaráðið syrgir í løtuni fyri at fyritreytirnar fyri tí eru í lagi. Tillagingar verða av dansku myndugleikunum gjørdar í reglum viðvíkjandi Ankestyrelsen, soleiðis at kærumyndugleikin uttan tropulleikur kann ásetast í trýggjari løgtingslóg.

Viðvíkjandi beinleiðis yvirgongd til pensjón millum ríkispartarnar ásetur rammulógin, at samráðast skal um spurningin, tá løgtingið hevur samtykt nýggja lóg á økinum. Frammanundan kann tó sigast, at onki sýnist at vera í vegin fyri beinleiðis yvirgongd, hvat fólkapensjón viðvíkur, tí reglurnar í báðum ríkispartunum verða, í tí líki, sum uppskotið nú fyriliggur, sera líkar. Somuleiðis eru treytirnar fyri at fáa fyritíðarpensjón líkar. Tí verður heldur onki, sum í tí sambandi bendur á, at nakar trupulleiki skuldi koma í. Í Danmark er arbeiðið við at endurskoða fyritíðarpensjónsskipanini fyri stuttum byrja. Hvat úrslitið av hesum verður, og hvussu tað kann ávirka nevnda spurning, ber ikki til at spáa um frammanundan, tí enn er ikki komið so langt áleiðis við reformarbeiðnum, at hóming fæst av, hvussu nýggja skipanin at enda kemur at síggja út.

Skrásetingarlógin má endurskoðast, soleiðis at til ber hjá Almannastovuni at nýta P-talið í sínum skráum, annars verður onki vunnið við einfaldgeringini av lógini og betru samkipanini við skattaskipanina. Sum er er klár heimild til at nýta P-talið í samskiftinum millum Toll & Skattstovuna og Almannastovuna, men Almannastovan hevur ikki loyvi til at brúka P-talið í samkoyring av egnu skráum.

1.3. Avleiðingar

av lógaruppskotinum væntast, tá ein tíð er farin, at fara at verða um 2 mió kr. á veitingarsíðuni. Á rakstrarsíðuni koma neyðugar nýfløgur til løkniútgerð at hava við sær tørv á eini serligari játtan til hetta endamát uppá 4 mió. Kr. Viðvíkjandi starvsfólkum verður mett, at tað ikki verður neyðugt við fleiri, men heldur ikki færri fólkum. Sí 37-39.

Á komandi síðum verða útgreinandi viðmerkingar gjørdar, og eru viðmerkingarnar skipaðar soleiðis:

	SÍÐA
ALMENNAR VIDMERKINGAR	
Inngangur	1
Lýsing av broytingunum í lógunum síðan 1948	5
Galdandi pensjónsreglur	
Atlinningar at galdandi lógum og uppskot til broytingar	15
Fíggarligar avleiðingar	22
1.Umsitingarligar avleiðingar	37
Viðmerkingar frá umnælandi myndugleikum	38
VIDMERKINGAR TIL TA EINSTØKU GREININA	39
FYLGISSKJØL	41

2. LÝSING AV BROYTINGUNUM Í PENSJÓNSLÓGUNUM SÍ_AN 1948

Við útgangsstøði í almenna viðmerkingunum til lógaruppskot síðan 1949 er niðanfyri gjørd ein stutt lýsing av upprunanum til galdandi lógir og søguligu gongdini, hvat broytingan viðvíkur. Greitt verður einans frá teim lógarbroytingum, sum hava verið umfatandi og prinsippielleir.
Eitt høvuðsendamál við broytingum, sum eru framdar í pensjónslógunum gjøgnum árini, hevur verið at tillaga føroyska veitingarsløgini, veitingarstøðið og treytirnar fyri tilfeingi av pensjón til danskt ásetingarnar hesum viðvíkjandi, har danska lógin alla tíðina er broytt nøkur ár frammanundan tí føroyska. Eisini áhugi 1975, tá fyrisitingin varð virtikin, hevur ein høvuðsgrundgeving fyri broytingum verið at skapa samsvar millum ríkispartarnar. Seinast í 1988, bóast langt var millum broytingar av stórvegis týdningi í 70- og 80-árunum.

Lógarbroytingarnar í 1970 eru tó eitt undantak í mun til sístaðnillan tillaginga, tí samanberingar lei í fyrsta - og, sert tað tá til, einasta - sinni verða gjørdar við lønarlagið í hvørjum landi sær. Og verður komið

til ta niðurstøðu, at veitingarnar í Føroyum ikki eiga at hækka samsvarandi hækkingunum í Danmark, visandi til, at lutfallið millum lønir og pensjón var umleið tað sama í báðum ríkispørtunum (umleið 48%). Broytingar í føroyska pensjónsstøðinum hevði tí havt við sær eina, í mun til lønirnar, hægri pensjón í Føroyum.

Meðan donsku pensjónsreglurnar hava verið fyri grundugari endurskoðan í øllum lunum nakrar ferðir, er hetta ikki hent í Føroyum. Her er einans lagt aftrat og omaná, við tí úrslitið, at trupult er at skilja samanhang í lógunum og endantál við nógvum av ásetingunum í dag.

2.1. Ellis- og avlamisrenta

Galdandi fólkapensjónslóg hevur sín uppruna í fólkapensjónslógini frá 1959, sum avloysti lógina um ellisrenta frá 1949, ið tá var fyri týðandi ábótum.

Ovara aldursmarkið fyri at fáa ellisrentu var 60 ár fram til 1949. Rentuupphæddin var í trinum stigum, heft at og hækkandi við tilgangsaldrinum 60, 65 ella 70 ár og varð rentan útgoldin hvønn ársfjórðing.

Frádráttur varð gjørdur í rentuni fyri inntøkur yvir ávísa avmarkaða upphædd, sum móttakarin hevði framíhjá, og fall rentan burtur, tá inntøkan útyvir pensjónina, ognarinntøka íroknað, fór uppum eitt ásett mark. Frádratturin í rentuni fyri inntøkur var í trinum stigum eftir inntøkustødd við ávíkavíst 60, 72 og 84 prosentum.

Rentumóttakarar høvdu rætt til ókeypis læknahjálp, heilivág, sjúkrahúsviðgerð o.a. í tann mun hesar útreiðslur ikki komu undir stuðul sambært reglurnar hjá sjúkrakassanum; harumframt var møguligt at søkja um persónligt ískoyti til ellisrentuna, sum kundi játtast, um mett varð í tí einstaka málinum, at støðan hjá viðkomandi var sera trupul.

Avlamispensjónslógin hevur sín uppruna í avlamispensjónslógini frá 1961, sum avloysti avlamistryggingarlógina, ið, eins og lógin um ellisrentu, var fyri umfatandi broytingum í 1949.

Treytin fyri at fáa avlamisrentu var limaskapur í avlamistryggingini, sum var tvungin fyri njótandi limir av statsgóðkendu sjúkrakassunum og sjálvboðin fyri gjaldandi limir og fyri limir av statskontrolleraðu sjúkratryggingini. Avlamispremia varð kravd inn av sjúkrakassanum saman við sjúkrakassalimagjaldinum.

Fyri at gerast limur í sjúkratryggingini, skuldi viðkomandi lúka heilsutreytirnar, t.v.s. ikki hava afturvendandi og ólekiligar sjúkur og brek. Hjá teimum sum, orsakað av heilsutreytunum, ikki kundu gerast limir, var fátækrahjálp einasti útvegur í neyðstøðu.

Treytin fyri at fáa avlamisrentu var, at vinnuførleikin var skerdur niður í ein triðing. Avlamisrentan var ein lægri upphædd enn hægsta ellisrenta (svarandi til tilgangsaldurin 70 ár), tó hægri enn mittasta ellisrenta við 65 ára tilgangsaldri. Eitt hjálparloysisískoyti kundi játtast, tá viðkomandi hevði tørv á støðugari røkt og hjáveru.

Eisini í avlamisrentuni varð gjørdur ein frádráttur fyri inntøkur, sum rentumóttakarin hevði útyvir rentuna, tó soleiðis, at rentan ikki kundi lækkað meira enn niður í ein triðing.

Avlamisrentumóttakarar høvdu, eins og móttakarar av ellisrentu, rætt til ókeypis læknahjálp, heilivág, sjúkrahúsviðgerð o.t., og høvdu harumframt rætt til hjálp til fyribyrgjandi heilsufyriskipanir (t.d. venjing í brúki av bandagum, røkt og viðgerð, o.t.). Persónligt ískoyti, eftir meting av figgjarligu viðurskiftunum í tí einstaka førinum, kundi somuleiðis veitast til avlamisrentuna.

Umframt at lúka treytirnar viðvíkjandi limaskapi, aldri, skerdum vinnuførleika, heimarætti og bústaði, var játtan av ellis- og avlamisrentu trestað av, at viðkomandi lýkti sonevndu tignartreytirnar (værdighedsbetingelser). Tað vildi til dømis siga, at umsøkjarin

> *"de seneste 10 år ikke har forringet sin økonomiske stilling ved handlinger til fordel for børn...eller ved uordentligt og ødselt levned".*

"de sidste 5 år vitterligt ikke har ført et levned, der i det almindelige omdømme vækker forargelse", ella

"de sidste 3 år ikke har oppebåret hjælp, der ifølge fattiglovgivningens regler har fattighjælps virkning".

Rættaravleiðing av fátækrahjálp kundi m.a. vera tap av valrætti, hjúnarbandsforboð, afturrindan av móttiknari hjálp o.a.

Kommunustýrini gjørdu tilráðing um ellisrentuna og høvdu eftirlit við og váttaðu, um treytirnar fyri framhaldandi rentu vóru tilstaðar. Amtið tók avgerð, útroknaði veitingina og metti um umsókn um persónligt ískoyti til pensiónina skuldi játtast.

Áheitan um avlamisrentu var innlatin til kommunustýrið, sum sendi áheitanina, saman við váttan frá sjúkrakassa og læknaváttan, viðari til sorinskrivaran, sum hevði skyldu at ansa eftir, at sjúkrakassaviðurskifti vóru í lagi og tignartreytirnar loknar. Vanlukkutryggingarráðið metti og tók avgerð um vinnuførleikin var niðursettur til 1/3 og um óhjálpni fyrilá. Við hesum og øðrum upplýsingum sum grundarlag varð rentan umsitin av amtinum.

Í 1949 vórðu, sum sagt, týðandi ábøtur framdar í lógunum og eru hesar upprunin til ta pensiónsskipan, vit kenna í dag. Ellis- og avlamisrenturnar hækkaðu munandi og reglurnar um frádrátt fyri inntøkur vórðu gjørdar lagaligari.

Avlamisrentan varð upprunaliga inntøkujavnað á sama hátt sum ellisrentan. Í 1949 vóru frávik gjørd í samband við frádrátt í avlamisrentuni fyri inntøkur. Ongin hækking skuldi gerast í inntøkugrundalagnum fyri ognarinntøkur og loyvt var at hava eina arbeiðsinntøka, sum svaraði til útgoldnu rentuupphæddina, óðrenn frádráttur varð gjørdur. Var móttakarin giftur, varð einans helvtin av inntøkuni tikin við í útrokningar-grundarlagið.

Bæði rentusløgini fingu felags grundupphædd, avlamisískoyti var lagt aftrat avlamisrentuni sum endurbót fyri serligar útreiðslur av avlamni, og allir rentumóttakarar, ið høvdu børn undir 18 ár, fingu eina barnaviðbót aftrat rentuni. Avlamisískoyti og barnaviðbót vórðu somuleiðis lækkaðar eftir inntøka við síðuna av pensjónini.

Ellisrentualdurin varð hækkaður frá 60 til 65 ár, fyri einsamallar kvinnur tó 62 ár. Sum endurbót við uppseting av ellisrentu til hægri aldur (67 ella 70), varð veitt ein bíðiviðbót.

Broyting varð gjørd í reglunum um avlamisrentu, soleiðis at børn undir 15 ár og ung imillum 15 og 18 ár, ið, orsakað av heilsutreytunum, ikki kundu gerast limir í sjúkrakassa, kundi fáa stuðul til avlamisfyrihyrgjandi fyriskipanir.

Rentan fall burtar og lummapeningur varð útgoldin til persónar, sum høvdu uppihald á ellisheimi.

Útgjald for fram annanhvønn mánaða í staðin fyri hvønn ársfjórðing.

Landsstýrið kom í 1949 við í fyrisitingini. Leiðbeinandi rætningslinjur fyri inntøkuútrokningina, serliga viðvíkjandi naturaliu-inntøkum, skuldu gerast av ríkisumboðnum í samráð við landsstýrið. Avgerðir í tí einstaka málinum um persónligt ískoyti til pensiónina, umframt meira fastar reglur fyri játtan av persónligum ískoyti, skuldu gerast í samráð við landsstýrið.

Broytingarnar í 1949 høvdu við sær eina ferfaldan av samlaðu útreiðslunum til ellis- og avlamisrentur, sum vórðu fíggjaðar við helvtarbýti millum statin og heimastýrið. Avlamisrentan var tó partvís fíggjað av inngoldnu premiunum (umleið 1/3).

2.2. Frá rentu til pensjón í 1959

Í 1959 varð fólkapensjónslógin sett í gildi og ellisrentan avskaffað. Samstundis fær avlamisrentan pensjónsheitið, hóast talan framvegis er um trygging í og við at hon framhaldandi partvís verður fíggjað við premininngjøldum.

Minstaupphæddin (folkepensionens mindstebeløb) lýsur prinsippiella umskifti frá eini "tørvspensjón", t.v.s. eini inntøkuheftari veiting, til eina rættarbundna fólkaveiting til øll yvir 67 ár, uttan mun fíggjarlig viðurskifti.

Afturat prinsippiella umskiftinum verða, umframt aðrar broytingar av minni týdningi, stórar hækkingar gjørdar í upphæddum, aldursviðbót til pensjonistar yvir 80 ár verður innført, frádráttarreglurnar viðvíkjandi inntøkujavningini verða gjørdar lagaligari, aldursmarkið fyri fólkapensión verður hækkað til 67 ár, pensjónin verður útgoldin hvønn mánaða og automatisk prístalsjavning av pensjónsveitingunum verður sett í gildi.

Talan var um sera stórar og dýrar ábøtur. T.d. varð avlamisrentan hækkað við umleið 85 prosentum. Fíggjarligu avleiðingarnar váru nærum ein tvífoldan av samlaðu útreiðslurnar til rentur og pensjón. Tí varð eitt tvungið fólkapensjónsgjald uppá 1 prosent av skattskyldugu inntøkuni innført fyri lutvíst at fíggja meirkostnaðin av nýskipanini, og broytingarnar framdar í 3 stigum fram til 1. april 1961.

2.3. Avtøka av tignartreytunum, broytt avlamishugtak o.a. í 1961

Í 1961 vórðu tignartreytirnar settar úr gildi. Reglan um, at umsøkjarin ikki tey seinastu 10 árini skuldu hava verrað sína fíggjarligu støðu við burturgeving, oyðslutum ella óríggiligum levna, varð tó broytt, soleiðis at slíkur atburður ikki longur forða fyri at fáa pensjón, men skuldi takast við í útrokningini av pensjónini í staðin, sum um viðkomandi framvegis átti ta upphædd, hann hevði "formøblað". Henda reglan er framvegis í gildi.

Fólkapensjónsrætturin varð víðkaður til, umframt einsamallar kvinnur, eisini at umfata kvinnur, sum váru giftar við pensjonistum, frá 62 ára aldri. Harumframt kundi framskundað fólkapensjón játtast frá 60 ára aldri, um heilsuviðurskifti ellar aðrar serligar umstøður talaðu fyri tí.

Treytin fyri avlamispensjón varð broytt. Arbeiðsførið skuldi vera niðursett varandi, áðrenn pensjón kundi játtast. Fyritreytin fyri játtan av pensjón var, at vinnuførið ikki kundi betrast við íverksetan av uppvenjingar- og útbúgvingarfyriskipanum. Fyri at fremja hetta bleiv tilskot latið til rakstur av endurbúgvingarfyriskipanum og ráðnum verður heimilað at taka pensjónsrættin aftur, tá vinnuførið var ella kundi betrast.

Avlamisstuðul varð víðkaður útum tað, sum hevði beinleiðis týdning við atliti til vinnu. Stuðul kundi latast fyri at lætta um gerandisdagin sum heild hjá avlamnum. Heimild ráðsins at játta stuðul til hjálpartól (hoyritól o.t.) varð víðkað samsvarandi hesum og húslig hjálparviðbót varð innført. Umframt hetta kundi avlamisveiting játtast til persónar, sum læknaliga mett uppfyltu treytirnar fyri pensjón, men tá høvdu so mikið stóra inntøku, at pensjón ikki kundi játtast.

Hjálparloysisískoytið varð avloyst av hjálparviðbót og røktarviðbót, sum innibar eina graduering av stuðlinum eftir, hvussu umfatandi hjálpartørvurin var.

Avlamispremingjaldið varð avskaffað við lógarbroytingunum í 1961. Hereftir skuldi 1/1 av fólkapensjónsgjaldinum roknast sum avlamispensjónsgjald. Samstundis varð kravið um limaskap í sjúkratrygging avskaffað og reglan um, at persónar við afturvendandi og ólekiligum sjúkum ikki kundu avlamistryggjast, sett úr gildi.

Ásettar vórðu reglur fyri avsetan av eini upphædd til stovnssetan av ellis- og røktarheimum og føst inntøkuheft gjøld ásett fyri uppihald á stovnum hjá persónum, sum høvdu aðra inntøka enn pensjónina.

Av nýskipanum annars í 1961 kunna nevnust:

at pensjón kundi veitast pensjonistum, sum, aftaná at hava fingið játtan, búsettust uttanlands.

- *at pensjonistar, sum høvdu gjaldsskyldu (bidragspligt) yvir fyri børnum, fingu barnaviðbót sum aðrir pensjonistar við uppihaldsskyldu, og*

at hækkingar vórðu gjørdar í pensjónsveitingunum í samsvari við upphæddirnar í hinum ríkispørtunum, ið vóru hækkaðar útyvir automatisku prístalshækkingarnar.

2.4. Inntøkuóheft grundupphædd, nýggjur avlamispensións-strukturur o.a. í 1967

Lógarbroytingarnar í 1967 umfataðu fleiri prinsippiellar broytingar.
Viðvíkandi fólkapensjónini hendi tann broyting, at øll yvir 67 ár, undantikið tey, sum fingu almenna tænastumannaeftirløn, fingu fulla grundupphædd uttan atlit til fíggarlig viðurskifti annars. Stats- og aðrir tænastumenn varðveittu minstaupphæddini. Umframt hetta varð barnaviðbótin gjørd óheft av inntøku. Sum mótvekt móti omanfyristandandi, ið fyrst og fremst kom teimum fíggarliga vælbjargaðu til góðar, varð pensjónsviðbót innført til tey, sum lítið og onki høvdu av inntøku við síðuna av pensjónini.

Avlamispensjónin varð, umframt hækkað munandi, grundleggjandi broytt. Pensjónin skuldi útgjaldast í trimum stigum eftir hvat talan var um at endurbøta fyri: fult, trýkvart ella hálvt avlamni.

Aftanfyri broytingarnar, sum áðrenn vóru framdar í Danmark, liggur í fyrsta lagið sjónarmiðið, at avlamispensjónin skal vera hægri enn fólkapensjónin, tí avlamispensjonistar eru í einum aldri, har vanligt er at hava arbeiðsinntøkur. Í øðrum lagið er broytingin grundað á endurgjaldssjónarmiðið, sum hevur við sær, at pensjónin skal vera sambærilig við lønarlagið í samfelagnum. Og í triðja lagið, at pensjónin skuldi lagast eftir, í hvussu stóran man arbeiðsførið varð niðursett.

Avlamispensjónsskipanin fekk í 1967 tað snið, hon hevur í dag:

Hægsta avlamispensjón (óarbeiðsføri = 1):
Grundupphædd
+ avlamisviðbót (_ grundupphædd)
+ óarbeiðsførisviðbót (_ grundupphædd)

Miðal avlamispensjón (óarbeiðsføri = 3/4):
Grundupphædd
+ avlamisviðbót

Lægsta avlamispensjón (óarbeiðsføri = 1/2):
1/2 Grundupphædd
+ 1/2 avlamisviðbót

Avlamisviðbótin avloysti gamla avlamisískoyti. Avlamis- ella óarbeiðsførisviðbótin vóru (og eru) óheftar av inntøku við síðuna av pensjónini. Avlamisveitingin (til ikki-pensjonistar) varð áseti við sonnu upphædd sum avlamisviðbótin.

Allar upphæddir hækkaðu, soleiðis at samsvar var millum ríkispartarnar, hvat veitingarstøði viðvíkti.

Fíggjarligu avleiðingarnar av lógarbroytingunum vóru ein so mikið stórur meirkosmaður, at rættarbundna grundupphæddin til fólkapensjonistar varð framd stigvíst fram til 1970. Harumframt varð fólkapensjónsgjaldið hækkað frá 1 til 2,5 % av skattskyldugu inntøkuni.

Av øðrum broytingum í 1967 kunnu nevnast:

at aldurstreytirnar fyri avlamispensjón vórðu broyttar aftur, soleiðis at avlamispensjón ikki kundi játtast, broytast ella aftartakast aftanó 60 ára aldur, men at miðal avlamispensjón kundi játtast til persónar millum 60 og 67 ár, um arbeiðsførið var niðursett samsvarandi treytunum fyri hægsta avlamispensjón,
at húsliga hjálparviðbótin varð avskaffað
at eftirlivandi hjúnafelagi hjá einum pensjonisti kundi fáa samlaðu pensjónina í 3 mánaðar aftanó andlát

hjúnafelagans, um eftirsitandi eisini var pensionistur, og
at pensjónsrætturin hjá serforsorgarsjúklingum varð víðkaður frá 1 til 6 mánaðar aftaná innleggingarmánaðan.

2.5. Avtøka av pensiónsgjaldinum, broytt inntøkugrundarlag fyri útrokning o.a. í 1970

Pensjónsgjaldið bleiv, aftaná at hava verið í gildi í góð 10 ár, avskaffað í 1970.

Annars vórðu broytingar gjørdar, sum í ávisan mun høvdu við sær einfaldari umsiting av lógini. T.d. varð farið frá at javna grundupphædd og pensjónsviðbót eftir ymiskum inntøkuásetingum. Í staðin fyri at javnað pensjónirnar eftir nettoinntøkum (inntøku minus skatt) skuldu tær javnast eftir bruttoinntøkum, t.v.s. eftir inntøkum uttan frádrátt fyri skatt og aðrar frádráttir. Tillagingar blivu gjørdar í frádráttarfríu upphæddini, soleiðis at broytingin í inntøkuásetingini ikki fekk avleiðingar fyri veitingarstøðið. Frádráttarprosentið varð broytt til 60% av inntøkuni mótvegis fyrr 60, 72 og 84 prosent, treytað av inntøkustødd.

Av øðrum broytingum kunnu nevnast:

at inntøkuheftu pensiónsviðbótin ikki kundi veitast pensjonistum, sum fingu pensión við uttanlands,
at tænastumenn, ið fingu eftirløn sambært broyttu lógina um tænastumannaeftirløn frá 1969, skuldu fáa fulla grundupphædd, meðan samskipanarfrádráttur varð gjørdur í tænastumannaeftirlønini. Tænastumenn eftir gomlu lógini varðveittu miustuupphæddina, men varð ongin frádráttur gjørdur í tænastumannaeftirlønini,
í samband við gjald fyri uppihald á ellis- og røktarheimi skuldi pensjónin í prinsippinum ikki fella burtur, men síggjast sum partur av gjaldinum fyri uppihaldið. Gjaldsreglurnar blivu broyttar, soleiðis at gjaldið í mesta lagi kundi verða 60% av inntøkuni, og
samstundis sum fólkapensjónsgjaldið fall burtur varð býtið av útreiðslunum millum staðin og heimastýrið broytt frá lutfallinum 4:3 (av útreiðslunum, tá pensjónsgjaldið varð frádrigið) til 1:1 av bruttoútreiðslunum, og varð heimilað heimastýrinum at avgera, hvussu føroyski parturin varð fíggjaður: yvir vanliga skattin, við avgjøldum ella á annan hátt.

Vísandi til, at fólkapensjónsupphæddin í prosent av bruttoarbeiðslønini hjá einum ófaklærdum arbeiðara í Føroyum var umleið tað sama sum í hinum ríkispørtunum (ávikavíst 48,4 og 48,8%) og vísandi til, at pensjónsviðbótin í hinum ríkispørtunum varð hækkað fyri at veita endurgjald fyri miss í samband við skattligar broytingar í Danmark, blivu hesar upphæddir, umframt viðbøturnar í avlamispensiónini, ikki hækkaður í 1970.

2.6. Gongdin frá 1972 til í dag

Møguleikin fyri at fáa pensjón áðrenn vanligan pensjónsaldur varð í 1972 víðkaður soleiðis at persónar, sum høvdu fylt 60 ár kundu fáa framskundaða fólkapensjón grundað á vantandi viumanøguleikar. Hugsað varð serliga um teir fiskimenn í fjarfiskiskapi, sum orsakað av heilsu-trupulleikum og vantandi møguleikum fyri øðrum arbeiði í landi, máttu gevast, tá teir komu upp í árini. Reglan viðvíkjandi tilkennan av pensjón vegna "svigtende helbred" verður víðkað til eisini at umfata "manglende erhvervsmuligheder" og "undtagelsesvis" í lógargreinini varð strikað til tess at slaka krøvini.

Fyri at geva so nógvum eldri sum gjørligt møguleika at verða verandi heima og harvið eisini sum longst at forða fyri innlegging á ellis- og røktarheim, vórðu reglur í 1972 innførdar í fólkapensiónslógina, sum heimilaðu at veita stuðul til umbygging av bústaðnum og hjálpartól, í prinsippinum uttan atlit til fíggjarlig viðurskifti hjá tí einstaka. Reglan um stuðul sum persónligt ískoyti kundi frammanundan nýtast til hetta endamál, men varð treytin tá, at fíggjarligu viðurskiftini loyvdu eyka stuðli.

Frádráttarprosentið fyri javning av pensiónsviðbótini varð í 1973 niðursett frá 60 til 30 kr av hvørjum 100 í inntøku útyvir pensiónina og pensjónsstøðið varð hækkað við 15% fyri at skapa samsvar millum føroysku pensjónirnar og tær í hinum ríkispørtunum, sum í 1972 vórðu hækkaðar útyvir tær hækkingar, sum stóðust av prístalshækkingum.

Umsitingin av sosialløggávuni varð yvirtikin av heimastýrinum í 1975, og varð Almannastovan sett at umsita øllar einstaklingaveitingar. Landsstýrið bleiv kærumyndugleiki fyri avgerðir tiknar av Almannastovuni.

Undantikið hækkingum í upphæddum, sum fylgdu automatiska prístalsviðgerðini og onkrum smávegis justeringum, hendir ikki stórvegis fyrr enn í 1988, tá hesar broytingar vórðu framdar:

veitingarstøðið varð hækkað samsvarandi donskum hækkingum,
pensjón til hjún verður roknað fyri hjúnafelagarnar hvør sær samsvarandi donskum reglum,
- *grundupphæddin skuldi einans roknast eftir eguari inntøku, ikki hjúna-felagans,*
- *frádráttarfríu upphæddin fyri regulering av grundupphæddini varð ásett við sama upphædd fyri stakar og giftar persónar,*
- *minstaupphæddin til tenastumenn varð avskaffað (ongin eftir frá gomlu skipanini),*
- *heimildin at játta hjálparteil og endurbúgvingarfyriskipanir varð flutt frá Vanlukkutryggingarráðnum til Almannastovuna,*
  heimastýrið fekk heimild at gera reglur og fyriskipanir á serfarsorgar- og røktarøkinum og endurgjaldsskipanin í økinum verður broytt til heildarskipan, samstundis sum endurgjaldsskipanini í øðrum økjum verð gjørd einfaldari.

Í 1989 varð heimilað heimastýrinum at upprætta kærustovn at avgera kærur sambært sosialu lógirnar, burtursæð frá kærum um avlamispensión, sum framhaldandi verða avgjørdar av donskum myndugleika.

Í 1992 varð heimilað umsitingini at veita stuðul til bústaðarátreiðslur sambært reglunar um persónligt ískoyti við afturgjaldsskyldu og tinglýsing av kravinum.

Í 1993 varð bíðiviðbótin avskaffað og regla innført um frádrátt í grundupphæddini fyri arbeiðsinntøkur hjá 67-69 ára gomlum pensjonistum.

Í 1994 varð tilskotsskipanin í sosialu økinum broytt frá endurgjaldsskipan til eina heildarveiting og reglurnar um sats- og prístalsregulering v.m. yvirførdar til heimastýrið.

1. januar 1995 komu reglurnar um innvinnan av pensjónsrætti, sum tillaging til Norðurlendska konventiónini, sum Føroyar undirskrivaðu í 1994, í gildi.

Og seinni í mai 1995 varð rammulógin fyri almannaveitingar í Føroyum viðtikin.

Umfram tær broytingar, sum nevndar eru, eru broytingar farnar fram, sum fylgja av bygnaðarbroytingum í donsku umsitingini, eitt nú viðvíkjandi kærumyndugleika, rúlgevingarskylda o.a., umframt prístals- og satsreguleringarnar.

Síðan 1959, tá automatiska prístalsviðgerðin av pensiónunum varð sett í gildi, og fram til 1.7. 1993, hevur veitingarnar verið javnaðar eftir donskum reglum. Við lóg nr. 227 frá 6. april 1994 verður heimilað heimastýrinum at gera reglur á hesum øki. Ongla regulering er farin fram síðan 1993. Landsstýrið hevur sett arbeiðsbólk, sum ætlandi verður liðugur um miðan april, at koma við álitið um javning av almannaveitingum framyvir.

2.7. Broytingar í einkjupensjónini síðan 1960

Reglurnar um hjálp til einkjur eru í forsorgarlógini, sum varð sett í gildi í 1960 í Føroyum. Frammanundan kundi hjálp veitast sambært lóg um fátakraverkið í Føroyum (frá 1895) og í lóg um kommunalar hjálparkassar (frá 1913).

Rætt til einkjupensjón høvdu
1) kvinnur, sum bliva einkjur aftaná 55 ára aldur,
2) kvinnur, sum bliva einkjur aftaná 45 ára aldur, tá høvdu uppihaldsskyldu fyri 2 ella fleiri børnum og
3) undantaksvíst einkjur og einsamallar kvinnur, sum høvdu fylt 50 ár, eftir tørvsmeting (heilsu- og onnur

serlig viðurskifti), umfram einkjar, sum hevdu fingið einkjupensjón eftir 2).

Einkjupensjónin verð tá, sum nú, áseta samsvarandi reglunum í fólkapensjónslógini og hava broytingar í stødið o.ø. sostatt fylgt broytingunum í hesi lóg. Reglurnar omaks hava verð sera líkar teimum, sum framvegis eru galdandi.

Í 1977 vórðu treytirnar fyri at fáa einkjupensjón broytar til tað, tær eru í dag: vanlig einkjupensjón til einkjur, sum hava børn undir 18 ár og í undantaksførum til 50 ára gamlar einkjur og einsamallar kvinnur yvir 50 ár, sí omanfyri undir 3).

Uppískoytisveitingin til einkjur, í upphædd svarandi til avlanisviðbót, varð í 1977 innført við løgtingslóg, sum í 1983 varð broytt soleiðis at hálv uppískoytisveiting kundi veitast í ár eftaná, at treytirnar fyri vanligari einkjupensión ikki longur vóru loknar.

3. GALDANDI PENSIÓNSREGLUR

Prinsippið um innvinnan av pensjón í mun til bústaðartíð varð innført í pensjónslógirnar í 1994, tá samtykt varð at verða við í norðurlendska sáttmálanum um sosiala trygd. Hini norðlandaltini byggja sínar pensjónir á hetta prinsipp, og fyri at samskipa, er neyðugt at tillaga seg til hetta.

Frammanundan varð rætturin til fulla pensjónsveiting, umfram heimarætt í danska ríkinum, einans treytaður av, at viðkomandi hevði fastan bústað í Føroyum og at viðkomandi hevði búð í ríkinum í mátsta lagi 1 ár fyri pensjónstilfatan.

Nú er treytin, umfram fastan bústað, 3 ára fastur bústaðar í danska ríkinum. Norðurlendski sáttmálin inniber, at frávik verður gjørt fyri hesar reglur, og at norðurlendingar sum hava búð í Føroyum, eins og føroyingar, ið hava búð í norðurlandum, hava rætt til pensjón í einum norðlandandi, bústaðar teir bigvn í einum øðrum norðlandandi ella einum landi innanfyri EØS-økið.

Pensjón til ein norðurlending, herfyrir eina føroying, sum hevur búð í fleiri norðlandum, verður útgoldin við talinum av fjørutiundapartum av teoretiskt møguligari bústaðartíð frá 15. Árinum til fyrátíðar- ella fólkapensjón verður játtað. Fólkapensjónin verður tó útgoldin við fullu upphæddini, um viðkomandi hevur búð 40 ár í landinum.

3.1. Fólkapensjón

Rætt til vanligu fólkapensjón hava øll frá 67 ára aldri: einsamallar kvinnur og kvinnur, ið eru giftar við pensjonistum, hava tó rætt til fólkapensión frá 62 ára aldri.

Fólkapensión er samansett av grundupphædd og pensjónsviðbót. Í pensjónsviðbótina er roknað viðbót fyri sjúkrakassalimagjald.

Til fólkapensjónina verður veitt ein aldursviðbót, tá pensionisturin er blivin 80 ár.

Framskundað fólkapensión kann eftir tørvi, grundað á mating av heilsuviðurskiftum, arbeiðsmøguleikum og øðrum serligum viðurskiftum, tillutast persónum yvir 60 ár.

Til ein giftan fólkapensjonist verður veitt ein hjúnarbandsviðbót, um hjúnalagin ikki móttekur pensjón.

3.2. Avlanispensjón

Hetgsta avlanispensjón kann tilkennast persónum millum 18 og 60 ár, sum orsakað av avlanni, verða mettir varandi óarbeiðsførir í einhvørji vinnu, ella sum einans hava smávegis arbeiðsevni.

Hægsta avlamispensjón er samansett av grundupphædd, pensjónsviðbót, avlamisviðbót og óarbeiðsførisviðbót.

Miðal avlamispensjón kann tillutast persónum millum 18 og 60 ár, hvørs vinnuføri, orsakað av avlamni, verður mett niðursett minni enn hjá einum hægsta avlamispensjónisti, tó í minsta lagi við einum triðingi. Harumframt kann miðal avlamispensjón tilkennast persónum millum 15 og 18 ár og millum 60 og 67 ár, hvørs vinnuføri er niðursett samsvarandi hægsta avlamispensjón.

Miðal avlamispensjón er samansett av grundupphædd, pensjónsviðbót og avlamisviðbót.

Til hægstu og miðal avlamispensjón verður somuleiðis løgd ein hjúnarbandsviðbót, um hjúnafelagin ikki móttekur pensjón.

Treytin fyri at fáa *lægstu avlamispensjón* er, at viðkomandi er millum 15 og 67 ár og at arbeiðsførleikin varandi er niðursettur við í minnsta lagi eini helvt.

Lægsta avlamispensjón er samansett av hálvari grundupphædd og hálvari avlamisviðbót..

3.3. Einkjupensjón og pensjón til einsamallar kvinnur

Rætt til vanliga einkjupensjón hevur einkja við einum ella fleiri børnum undir 18 ár.

Einkjupensjónin er samansett av sonu upphæddum sum fólkapensjónin við eini uppískoytisveiting, svarandi til fulla avlamisviðbót.

Einkja, sum hevur móttikið vanliga einkjupensjón, hevur rætt til hálva uppískoytisveiting 1 ár aftaná at barnið er blivið 18 ár.

Einsamallar kvinnur yvir 50 ár og *einkjur, sum hava móttikið vanliga einkjupensjón*, kunnu eftir tørvi, t.v.s. um heilsuviðurskifti, arbeiðsmøguleikar og onnur setlig viðurskifti tala fyri tí, fáa pensjón við sonu upphædd sum fólkapensjónin.

3.4. Viðbøtur

Umframt nevndu viðbøtur kunnu pensjonistar hava ella fáa rætt til barnaviðbót og hjálpar- ella røktarviðbót. Barnaviðbótin til lægstu avlamispensjón er hálv.

Einkjur hava rætt til barnastyrk sambært lógina um barnagjald til einsamallar uppiheldarar við sonu upphædd sum barnaviðbótin, og fáa ikki barnaviðbót til pensjónina.

Ikki-pensjonistar kunnu fáa rætt til avlamisveiting.

Allir pensjonistar hava skyldu til at vera limir í sjúkrakassa.

3.5. Endamál, støðd og regulering av teim ymsu pensjónupphæddunum (seinast ásettar pr. 1. juli 1993)

Grundupphæddin verður sum útgangsstøðið útgoldin til allar pensjonistar at tekka basada livikostnaðin. Grundupphæddin er 37.968 kr um árið, um hjúnafelagin eisini fær pensjón og 47.784 kr í øðrum føtum. Grundupphæddin til pensjonistar undir 67 ár, sum hava øðra inntøku og til pensjonistar millum 67 og 70 ár, sum hava arbeiðsinntøku, verður minkað við 60 kr fyri hvørjar 100 kr. sum inntøkan fer uppum 24.100 kr. árliga. Hjá avlamispensjonistum verður ein upphædd uppá 14.900 kr. fyri arbeiðsinntøkur, løgd aftrat teim 24.100 kr, áðrenn grundupphæddin verður minkað. Grundupphæddin er skattskyldug.

Pensjónsviðbótin er serliga ætlað pensjonistum uttan ella við smáum eykainntøkum at dekka vanliga livikostnaðin. Pensjónsviðbótin er 7.008 kr um árið, um hjúnafelagin eisini fær pensjón og 8.820 kr í øðrum førum. Pensjónsviðbótin hjá einum pensjonisti, giftum við einum pensjonisti, verður minkað við 15 kr. fyri hvørjar 100, sum inntøkan fer uppum eina samlaða inntøku hjá hjúnunum uppá 17.800 kr um árið, í øðrum førum við 30 kr fyri hvørjar 100, sum inntøkan fer uppum 12.100/17.800 kr um árið. Pensjónsviðbótin er skattskyldug.

Avlamisviðbótin skal dekka tær útreiðslur, sum eru tengdar at brekinum hjá viðkomandi. 5 ymiskir satsir eru fyri avlamis-viðbótina, treytað av um viðkomandi er giftur við pensjonisti og hvat slag av pensjón hjúnafelagin í so fall fær. T.d. er avlamisviðbótin hjá einum støkum persóni 22.260 kr um árið, meðan hon er 19.068 kr, um hjúnafelagin hevur rætt til sama slag viðbót. Avlamisviðbótin verður veitt uttan mun til inntøku og er ikki skattskyldug.

Óarbeiðsførisviðbót skal kompensera fyri vantandi inntøkumøguleikum sum fylgja av vantandi arbeiðsføri. Viðbótin er 22.320 kr um árið, um hjúnafelagin eisini hevur rætt til óarbeiðsførisviðbót og 30.852 kr í øðrum førum. Viðbótin verður veitt uttan mun til eykainntøku og er skattskyldug.

Uppískoytisveitingin varð innførd í einkjupensjónina, sum frammanundan var sama upphædd sum fólkapensjónin, fyri at dekka vanliga livikostnaðin hjá forsyrgjandi einkjupensjonistum. Veitingin verður minkað í framhaldi av grundupphæddini á sama hátt sum hendan. Uppískoytisveitingin er sama upphædd sum avlamisviðbótin til stakan persón og er skattskyldug.

Hjúnarbandsviðbótin, sum er 4.200 kr um árið, verður útgoldin til giftar pensjonistar, um hjúnafelagin ikki er pensjonistur. Viðbótin verður minkað við eykainntøkum á sama hátt sum og í framhaldið av pensjónsviðbótini. Hjúnarbandsviðbótin er skattskyldug.

Barnaviðbótin er ætlað at dekka meirlivikostnaðin, sum stendst av at uppihalda børnum og verður veitt øllum pensjonistum sum hava uppihalds- ella gjaldsskyldu yvir fyri børnum undir 18 ár. Tó undantikið, um barnið móttekur barnagjald ella er undir almennari forsorg. Barnaviðbótin er sama upphædd, sum ásett í lógini um barnagjald til stakar uppihaldarar v.m. og er faðirgjaldið í løtuni 669 kr um mánaðan og móðirgjaldið 442 kr um mánaðan. Barnaviðbótin er óbeft av inntøku og verður um skattaskipanina útgoldin í navni barnsins og er skattskyldug hjá hesum.

Aldursviðbót verður veitt til fólkapensjónistar yvir 80 ár. Upphæddirnar eru 5 í tali, treytaðar av um pensjonisturin er einsamallur, giftur, giftur við pensjonisti og hvat slag av pensjonisti, hann er giftur við. Fyri ein stakan pensjonist er aldursviðbótin 3.947 kr um árið.

Persónligt ískoyti kann veitast til allar pensjonistar, hvørs (fíggjarligu) viðurskifti eru serliga trupul. Ongin avmarking er gjørd í lógini fyri, hvørji endamál persónligar viðbøtur kunnu veitast ella støddina av viðbótini. Almannastovan kann avgera, hvørji endamál eru rímilig, nær rímiligt er at veita (inntøku- og ognartreytir) og við hvussu stórari upphædd, aftaná eina ítøkiliga meting í tí einstaka førinum. Landsstýrið kann gera reglur fyri, hvussu veitast skal. Mest vanligu veitingarnar eru ískoyti til heilivág, tannviðgerð, sjúkuviðgerð, o.t. Harumframt verður ofta latið ískoyti til útreiðslur av umvæling og útskiftan av húshaldstóhun, o.t. Seinnu árini hevur talið av umsóknum um ískoyti til bústaðarútreiðslur verið vaksandi.

Avlamisveiting verður tilkend persóni, hvørs arbeiðsføri orsakað av avlamni læknaliga sæð verður mett samsvarandi tí hjá einum hægsta ella miðal avlamispensjonisti, men sum, orsakað av høgari inntøku, ikki verður tilkendur pensjón. Veitingin verður útgoldin uttan mun til inntøku og hevur sama endamál sum avlamisviðbótin. Avlamisveitingin er 17.412 kr kr um árið, um hjúnafelagin fær somu veiting ella avlamisviðbót og 21.432 kr. um árið í øðrum førum, also nú nakað lægri enn avlamisviðbótin, sum hon upprunaliga varð ásett samsvarandi. Avlamisveitingin er ikki skattskyldug.

Hjálparviðbót verður tilkend persónum, sum tørva persónliga hjálp frá øðrum ella eru blindir ella hava nógv niðursetta sjón og *røktarviðbót* verður tilkend persónum, sum varandi hava brúk fyri røkt ella støðugari hjá veru til tess at dekka útreiðslurnar av hesum. Hesar viðbøtur verða veittar uttan mun til inntøku og eru ávikavísk 22.260 og 44.412 kr kr um árið. Hjálpar- og røktarviðbót eru ikki skattskyldugar.

3.6. Inntøkugrundarlag fyri útrokning av pensiónum

Inntøkur, ið, sum útgangsstøðið, skulu takast við í grundarlagið, sum pensjónin verðu javnað eftir er bruttoinntøkan, t.v.s. inntøkan uttan skattafrádrátt ella annan frádrátt, sí viðmerkingarnar til lógarbroytingarnar í 1970. Ongin broyting er gjørd hesum viðvíkjandi síðan.

Sambært galdandi reglur skulu allar inntøkur, sum pensjonistur hava forvannið kalendaraárið fyri, roknast uppí, tá inntøkan stavar frá persónligum arbeiði, eftirløn, fastogn, fíggjarogn, lívrentu, privatum ella almennum studningi, lívrentu o.l.

Frá inntøkuni kunnu dragast rakstrarútreiðslur, t.v.s. tær útreiðslur, sum eru nýttar til at vinna, tryggja og viðlíkahalda inntøkuna.

Sosialar pensjónir, barnastyrkur og aðrar samsvarandi sosialar veitingar verða ikki roknaðar uppí.

Uppihaldspeningur til børn skal einans roknast uppí við teirri upphædd, sum hesin er hægri enn vanliga barnagjaldið (bidrag).

Síggast skal burtur frá samskipanarfrádráttinum sum verður gjørdur í tænastumannaeftirlønum frá stati, landi, kommunum o.t. T.v.s. at hesin frádráttur skal leggjast aftrat aftur útgoldnu tænastumannaeftirlønini. Virðið av naturalium skal leggjast aftrat, og kann landsstýrið gera rætninslinjur fyri inntøkuútrokningina, herímillum leiguvirði av egnum bústað.

Um so er, at pensjonisturin knappliga hevur mist møguleikan at forvinna somu arbeiðsinntøku (sum seinasta kalendaraár), skal fyrsta pensjónsútrokningin grundast á tí minni arbeiðsinntøku, sum hann, aftaná broytingina, verður mettur at vera førur fyri at forvinna.

Inntøkugrundarlagið kann broytast í árinum, tá inntøkan hjá einum pensjonisti varandi broytist so mikið, at ein nýggj útrokning gevur annað pensjónsúrslit.

Tá allar inntøkur eru samanlagdar sambært omanfyri standandi, verður frádráttarfría inntøkuupphæddin, umframt ein útrokningarfrádráttur fyri allar pensjonistar og ein eyka frádráttur fyri arbeiðsinntøkur hjá avlamispensjonistum troknaðir og pensjónin útroknað.

3.7. 20%'s frádráttur fyri endurgjøld

Hjá avlamispensjonistum og einkjupensjonistum, sum hava fingið endurgjald svarandi til endurgjald við minking av vinnaførinum við meira enn 20 % sambært lógina um vanlukkutrygging el. líkn, føroyska, dauska ella útlendska lóg, verður ein frádráttur gjørdur í pensjónini. Frádráttarin er 20 % av teirri upphædd, sum faktiska rentan ella lívrentan, sum kundi verði keypt fyri kapitalupphæddina, um endurgjaldið varð kapitaliseræð, fer uppum eina upphædd uppá í løtuni 8.306 kr fyri støk og 11.800 kr fyri onnur.

3.8. Útrokning av pensión í samband við burturgeving, óriggiligan og oyðslutan levnað

Um so er, at pensjonistur ella hjúnafelagin hjá viðkomandi við hansara vitan og vilja, seinastu 10 árini fyri pensjónstilkennan, við handlingum til fyrimuns fyri børn ella onnur, ella við oyðsli og óriggiligum levna, hevur verrað síni fíggjarligu kor, skal pensjónin útroknast, sum um hann ikki hevði verra síni kor á nevnda hátt. Tó skal síggast burtur frá tí, ið viðkomandi hevur brúkt til uppaling og undirvísing hjá egnum børnum.

3.9. Pensjón og gjald í samband við varandi uppihald á serforsorgar-stovnum, ellis- og røktarheimum, sjúkrahúsum, o.a.

Sambært nýggjastu reglurnar á hesum øki verður pensjón útgoldin óskerd, tá pensjonistur búgva í

sambýlum. Hesir gjalda so fyri uppihaldið av pensjónini.

Hjá persónum við váttfevnandi sálarligum ella likamligum brekum, dettur pensjónin burtur, tá uppihaldið á serforsorgarstovni, psykiatriska deild e.l. í einum tíðarskeiðið uppá 1_ ár er farið útum 6 mánaðar. Á vanligum sjúkrahúsi (fyri somatiskar sjúkur) verður pensjónin varðveitt uttan mun til innleggingartíð. Tó dettur møguligar hjálpar- og røktarviðhønur burtur. Sama reglur eru galdandi fyri tey, sum sita revsing e.t. sambært dóm.

Á ellis- og røktarheimum fellur pensjónin burtur, tá uppihaldið er varandi. Í staðin verður hummapeningur útgoldin.

Á ellis- og røktarheimum verður goldið fyri uppihaldið, um so er, at pensjonistur hevur aðrar inntøkur, t.d. tenasta-eftirløn, renteinntøkur, krigsskaðaendurgjald o.s. Eftir lógini skal gjaldast ein upphædd sum er í mesta lagið 60 % av inntøkuni og í útrokningini skal fyrilit havast við burturlotna partinum av pensjónini. Í pensjónslógarinnar fatan er inntøka at skilja sum brutto-inntøka. Í kunngerð galdandi frá 1. apríl 1993 verða reglur gjørdar fyri útroknan av gjaldinum soleiðis at hetta skal takast av netto-inntøkuni í staðin fyri brutto.

3.10. Umsitingarmyndugleikar

Tað eru, ríkisumboðsmaðurin undantikin, framvegis sama myndugleikar, sum nevndir eru undir søguliga partinum um ellis- og avlamisrentuna, sum eru við í umsitingini av pensjónum.

Kommununar taka ímóti, kanna og syrja fyri, at neyðug skjalprógv fylgja við umsóknum um pensjón. Tær skulu gera tilráðing um framskundaða fólkapensjón, avlamispensjón og einkjupensjón.

Sýslumaðurin (í Havn fútin) skal ummeta í samband við einkjupensjón til einkjur, sum ikki hava børn undir 18 ár og pensjón til einsmallar kvinnur yvir 50 ár.

Vanlukkutryggingarráðið avgerð um avlamispensjón skal tilkennast o.a. og ger tilráðing um tilluttan av framskundaðari fólkapensjón, sum landsstýrið tekur avgerð um.

Annars er tað Almannastovan, sum hevur umsitingina av pensjónslógini um hendi.

4. ATFINNINGAR AT GALDANDI LÓGUM OG UPPSKOT TIL BROYTINGAR

4.1. Pensiónsskipanin

Pensjónsløg eftir galdandi reglum eru:
Vanlig aldurstreytað fólkapensjón, 67 ár
1) *Fólkapensjón til einsmallar kvinnur, 62-66 ár*
2) *Fólkapensjón til kvinnur, giftar við pensjonistum, 62-66 ár*
3) *Framskundað fólkapensjón grundað á serligar umstøður, 60 ár*
4) *Vanlig einkjupensjón, børn undir 18 ár*
   Framhaldandi einkjupensjón afturá at børnini eru blivin 18 og pensjón til einsmallar kvinnur grundað á serligar umstøður, 50 ár

Hægsta avlamispensjón
5) *Miðal avlamispensjón*
6) *Lægsta avlamispensjón*

Reglurnar eru at finna í 4 lógum - sí íntgangin - og umfata tilsamans yvir 100 lógargreinar, sum, av tí at reglurnar í teim 4 lógunum gangga aftur í sama mátan føroan, kanna niðurskrivast til eitt nógv minni tal av greinum. Torført er at yvirskoða reglurnar og at skilja endamál og samanhangir í núverandi formi.

Tí er skotið upp at samskipa og samanskriva allar pensjónsreglur í eina lóg, sum samstundis ger samlaðu skipanina meira yvirskoðiliga fyri borgara og umsiting.

Í uppskotinum eru galdandi reglur um pensjón í teim 4 lógunum skipaðar í eina lóg umfatandi fólkapensjón og eina fyritíðarpensjón í 3 stigum. Í uppskotinum eru galdandi treytir fyri at fáa fyritíðarpensjón broyttar soleiðis, at munur ikki longur verður gjørdur ímillum kvinnur og menn, at pensjón ikki verður játtað uttan so, at serligar umstøður tala fyri tí (heilsa, arbeiði, annað) og at pensjón ikki longur kann játtast til persónar undir 60 ár, uttan so at tað ikki hevur verið møguligt at finna passandi arbeiði ella at menna arbeiðsførið soleiðis, at viðkomandi kann átaka sær eitt passandi arbeiði. Pensjónssløgini sambært uppskotið verða:

1) *Fólkapensjón - svarar til 1) omanfyri*
2) *Hægsta fyritíðarpensjón - svarar til 7) omanfyri,*
3) *Miðal fyritíðarpensjón - umfatandi 5) og 8) omanfyri*
4) *Lægsta fyritíðarpensjón - umfatandi 2), 3), 4), 6) og 9) omanfyri.*

Vísandi til javnstøðulógina og til, at tað í dag er vanligt at kvinnur hava sjálvstøðuga lønarinntøku og eru meðuppihaldarar í familjuni, og tí ikki, sum vanligt var fyrr, tá upprunaligu fólkapensjónslógin var sett í gildi, eru heimaarbeiðandi og uppihildnar av manninum burturav, verður skotið upp, at kvinnur ikki longur fáa serstøðu í pensjónslógini.

Harafturimóti verður skotið upp, at møguligt verður at veita fyritíðarpensjón á lægsta stigi svarandi til fólkapensjónsupphæddina, um treytirnar, sum í dag eru galdandi fyri framskundaða fólkapensjón og einkjupensjón eftir undantaksregluni, eru til staðar. Hetta uttan mun til um talan er um kvinnur ella menn. Eru ásettu treytirnar loknar, kann pensjón tillutast. Aldurin verður settur til 50 ár, sum í galdandi treytum fyri pensjón til einkjur uttan børn og einsamallar kvinnur. Menn skulu sostatt eisini kunna fáa pensjón, lúka teir soma treytir.

Ætlanin við nýggju fyritíðarpensjónini er ikki at viðka skaran av persónum, sum hava rætt til pensjón ella almannaveiting av einhvørjum slagi. Afturat persónum, sum longu fáa pensjón av hesum slagi (einkjur og einsamallar kvinnur) koma persónar yvir 50 ár, sum í dag fáa ella vildu havt rætt varðandi veiting. Hetta er ein veiting, sum verður játtað í førum, har ymisk staðlandi ella aktiverandi tiltøk hava verið úrslitaleys, ella at mett hevur verið frammanundan ,at slíkar royndir eru til fánýtis. Komið er sostatt til tu niðurstøðu, at viðkomandi ikki hevur aðrar møguleikar at skaffa sær og sínum til uppihalds enn við varandi almannaveiting. Oftast verður komið til hesa niðurstøðu aftanó eina tíð, har viðkomandi hevur fingið fyribils forsorgarveiting vegna arbeiðsloysi ella av øðrum orsøkum. Hetta saman við ymiskum øðrum staðli, herímillum persónligari ráðgeving og leiðbeining, staðli til at finna arbeiði ella endurbúgvandi staðul av einhvørjum slagi.

Reglurnar í galdandi lógum hava við sær, at grunduppheddirnar hjá einum fólkapensjonisti og einum avlamispensjonisti skulu mátast í mun til hvørja aðra og ásetast á annan hátt, enn tá talan er um tveir fólkapensjonistar ella tveir avlamispensjonistar, sum eru giftir við hvørjum øðrum. Uppskotið inniber at viðgerðin av øllum pensjonistum er eins, uttan mun til, hvat slag av pensjón, viðkomandi fær. Tí munur verður einans gjørdur í upphæddum hjá einsamallum pensjonistum og giftum, og ikki, sum í galdandi reglur, eftir pensjónskombinatiónum.

Tá skotið verður upp, at heiti verða broytt, er hetta grundað á, at tað ikki verður hildið neyðugt í heitinum at nágreina, á hvørji grund pensjónin er játtað: avlamni, einkjustøðu, samansettar heilsu- og arbeiðstrupulleikar, e.a.

Systematikkurin er í staðin grundaður skilmarkan millum fólkapensjón, sum øll hava rætt til, tá ávísur aldur er náddur (67 ár) og *fyritíðarpensjón*, sum kann tillutast áðrenn vanligar pensjónsaldur, um *serligar varandi forðingar* fyri fíggjarligum sjálvbjargni eru til staðar. Og eru tey 3 stigini grundað á *veitingarstøðini*, sum eisini eru í galdandi lógum. Tó burtursæð frá lægstu avlamispensjón, sum skotið er upp at hækka og viðgera á sama hátt sum fólkapensjón áðrenn 67 ára aldur eftir galdandi reglum.

Sum avleiðing av broytingini í heiti og álíku samansetingini av pensjónunum, fær eisini "avlamisviðbótin", sum, hvat stødd av upphæddini viðvíkur, eisini í galdandi lóg verður veitt øðrum enn avlamnum, annað

heiti. Galdandi *uppískoytisveiting* til einkjur er sama upphædd sum avlamisviðbótin, og fáa hesar báðar í uppskotinum tí heitið *fyritíðarviðbót.*

4.2. Pensjón til børn

Sambært galdandi reglur kann pensjón veitast frá 15 ára aldri. Sum kunnugt hava foreldur uppihaldsskyldu fyri børnum sínum undir 18 ár. Samfelagsstøðan er broyti grundleggjandi síðan galdandi reglur vórðu innførdar. Flestøll børn fóru tá út at tæna, tá tey vóru konfirmeraðe. Í dag er fleirtalið av børnum í skúla ella undir útbúgving til tey eru 18 ár og longur.

Afturat hesum kemur, at tær meirútreiðslur, sum foreldur at brekaðum børnum hava í mun til onnur foreldur, í dag kunnu endurgjaldast sambært §§ 17 og 18 í forsorgarlógini. Eisini hetta talar ímóti at halda fram við játtan av pensjón til børn.

Spurningurin um evt. endurbót til ung (16-17 ára gomul) avlamin vegna væntandi møguleika fyri at skaffa sær inntøku við arbeiði, eitt nú í summarmánaðunum, tá onnur ung hava møguleikar fyri tí, eigur at verða tikin upp í samband við endurskoðan av forsorgarlógini.

Skotið verður tí upp, at pensjón verður veitt frá 18 ára aldri.

4.3. Lægsta avlamispensjón

Lægsta avlamispensjón hevur, orsakað av upphæddini, verið óheppin, tí upphæddin røkkur ikki at dekka livikostnaðin av tí mest neyðturviliga til uppihalds. Tað hevur havt við sær, at ein stórur partur av teim, sum hava fingið hesa pensjón, samstundis hava fingið ískoytisstuðul sb. § 13 um varandi veiting í forsorgarlógini, ofta byrjandi við fyribils hjálp eftir § 9 í fleiri ár.

Tað vísur seg nevniliga, at ein stórur partur ikki fær brúkt síni restarbeiðsevni. Og hetta er ikki ein nýggjur trupulleiki við uppruna í verandi støðu á arbeiðsmarknaðinum.

Lægstu avlamispensjonistar hava eftir galdandi reglum rætt til hálva grundupphædd, hálva avlamisviðbót og hálva barnaviðbót. Fær hjúnafelagin miðal ella hægstu avlamispensión verða hálvu upphæddirnar hálveraðar einaferð enn. Pensjónsviðbót verður ikki løgd aftrat pensjón á hesum stigi.

Skotið verður upp, at fólkapensjónsupphæddin, sum annars er lægst møguliga pensiónsútgjald, í framtíðini eisini verður veitt teimum, sum framyvir koma at fáa ta pensjón, ið svarar til lægstu avlamispensjónina eftir galdandi reglum.

Full grundupphædd, pensjónsviðbót og evt. barnaviðbót verður sostatt veitt til hægstu avlamispensjón eftir uppskotinum í staðin fyri hálva grundupphæddina, hálvu avlamisviðbótini og hálvu barnaviðbótina. Upphæddirnar verða javnaðar sum aðrar pensjónir til persónar undir 67 ár. Hetta hevur við sær, at nakrir fáir persónar, sum í dag, orsakað av inntøku, einans fáa avlamisviðbótinina, komu at missa pensjónina. Tí er í yvirgansreglu skotið upp, at varðveita hesa í tann mun viðkomandi ikki fær eina pensjón eftir nýggju reglunum, sum er eins stór og avlamisviðbótin, ið dettur burtur.

Ein stórur partur av lægstu avlamispensjonistunum koma at fáa eina hægri pensjónsveiting enn í dag, men so detta aðrar ískoytisveitingar sambært forsorgarlógina burtur.

4.4. Tær smáu viðbøturnar

Skotið verður upp, at hjúnarbandsviðbót, sjúkrakassaviðbót og aldursviðbót verður tiknar av.

Hjúnarbandsviðbótin (350 kr um mánaðan) verður latin giftum pensjonistum, tá hjúnafelagin ikki fær

pensión, og verður hon regulerað í framhaldi av pensjónsviðbótini.

Hjúnarbandsviðbótin er so lítil, at hon ikki dekkar uppihald hjúnafelagans, skuldi hesin ikki havt egna inntøku. Hevur giftur pensionistur figgjarligar trupulleikan, t.d. tí hjúnafelagin ikki hevur arbeitt úti og uppihaldsgrundarlagið tí minkar nógv, tá tann eini gerst pensionistur, skal meira til enn henda viðbótin til at dekka uppihald familjunar. Tí verða møguligir figgjarligir trupulleikar hjá hjúnum, har tann eini er pensjonistur antin loystir við at tilluta fyritíðarpensión til hjúnafelagan, um viðkomandi lýkur treytirnar, ella við at veita hjúnafelaganum stuðul sambæri forsorsargarlógina, møguliga saman við stuðli til endurbúgving, soleiðis at viðkomandi kann verða við til at forsyrgja familjuni (yngri fólk). Ein triðji møguleiki er at veita persónliga viðbót til pensjonistin upp til pensjónsupphædd til hjún í tíðini til hjúnafelagin fær rætt til pensjón.

Eftirsum hjúnarbandsviðbót verður javnað eftir inntøku, er umstendiligt at umsita eina yvirgangsreglu, har hon verður varðveitt fyri tey, sum í dag fáa hana. Tí verður skotið upp, at hon fellur heilt burtur.

Sjúkrakassaviðbótin hevur í fleiri ár verið løgd aftrat og sædd sum ein partur av pensiónsviðbótini og regulerað saman við hesi. Í uppskotinum verður hon avskaffað sum sjálvstøðug viðbót, samstundis sum pensiónsviðbótin verður hækkað við samsvarandi upphædd.

Aldursviðbótin (80 ár) hevur helst, tá hon í sini tíð varð innført, havt sum endamál at dekka meirútreiðstur av elli. Slíkar verða í dag veittar, antin sum eyka stuðul til røkt, hjálp, heilivág, sjúkraviðgerð o.s.fr. ella við at pensionisturin kemur á ellis- og røktarheim. Tí verður skotið upp, at eisini hon kemur at fellu burtur. Tó við yvirgangsreglu varðveitt fyri tey, sum í dag fáa hana.

Pensjónirnar verða eftir uppskotinum samansettar soleiðis:

FP: Grundupph. + pensjónsviðb.
LFP: Grundupph. + pensjónsviðb.
MFP: Grundupph. + pensjónsviðb. + fyritíðarviðb.
HFP: Grundupph. + pensjónsviðb. + fyritíðarviðb. + óarbeiðsførisvb.

FP: fólkapensjón LFP: lægsta fyritíðarpensjón MFP: miðal fyritíðarpensjón HFP: hægsta fyritíðarpensjón

4.5. Frádrátturin í pensjónini fyri inntøkur (inntøkujavning)

Skotið verður upp, at farið verður aftur til at luta grundupphæddina til fólkapensionistur vera óhefta av inntøku. Í 1992 varð innført tann regla, at arbeiðsinntøkur hjá fólkapensionistum, 67-69 ár, skuldu hava við sær lækking í grundupphæddini, tá inntøkan fór uppum ávíst mark, meðan tænastupensiónir, rentuinntøkur, krígsskaðaendurgjald o.a. framhaldandi ikki skuldu ávirka.

Eitt av endamálunum við broytingini var sparing. Tá samanum kom var sparingin lítil, undir 2 mió kr. Og hevur reglan týðuliga sosiala slagsíðu, tí hon rakar tey, sum ikki hava aðrar møguleikar at skoyta uppí fólkapensjónina, enn við smávegis arbeiði nú og tá, til dømis við egning, nøkrum arbeiðstímum á flakavirki, reingerð e.t.

Umsitingarliga hevur tað skapt nógv meirarbeiði at viðgera fólkapensjónina ymist eftir um talan er um hetta ella hitt slagið av inntøku fyri sama bólk av pensjonistum. Ikki-eintýðugu skrásetingarnar hjá Toll & Skuttstovuni av inntøkusløgum hevur somuleiðis havt sín luf í hesum meirarbeiði.

Alternativið til fyriliggjandi uppskot er, at grundupphæddin verður javnað eftir *øllum* inntøkum, hæði arbeiðs- og eftirlønarinntøkum v.m., upp til og við 69 ár. Tað er umsitingarliga lættari at hava við at gera. Og hevði verið ein sparing, sum sást aftur. Fyritreytin fyri hesi broyting er tó, at broytingar verða gjørdar í reglunum um tænastumannaeftirlønir, soleiðis at samskipanarfrádráttur ikki verður gjørdur fyrr enn viðkomandi er 70 ár.

Sambæt galdandi reglur skal grundupphæddin hjá pensjonistum undir 67 ár (undir 70 ár fyri arbeiðsinntøkur) minkast 60 kr fyri hvørjar 100 um árið, sum inntøkan fer uppum í løtuni 18.900 kr. Síðan skal, áðrenn roknað verður, hjá øllum pensjonistum frádragast ein upphædd á kr. 5.200 í inntøkugrundarlagnum. Hjá avlamispensjonistum, sum hava inntøkur av arbeiði, skal harumfram gerast ein eyka frádráttur í inntøkugrundarlagnum uppá í løtuni kr. 14.900 fyri arbeiðsinntøkur.

Fyri at gera skipanina einfaldari verður skotið upp, at inntøkufríu upphæddin og frádráttur, sum allir pensjonistar hava rætt til, verður samanløgd til *ein* frádrátt uppá 18.900 + 5.200 = 24.100 kr. Hetta er ein prinsippiel broyting, tí frádráttarfríu inntøkuupphæddin er grundað á sjónarmiðið, at pensjonistur kann forvinna 18.900 kr., áðrenn pensjónin minkar. Meðan fyriliggjandi uppskot byggir á sjónarmiðið, at grundupphæddin í prinsippinum er inntøkujavnað fyri fyritíðarpensjonistar, men at javningin er avmarkað við einum frádrátti í inntøkuni.

Útgoldnað upphæddin verður í praksis hin sama, men rættari beinanvegin.

Fyri pensjonistin og umsitingina hevur hetta skiftið tó stóran lætta við sær. Trupulleikar standast ofta av, at pensjonistar, av røttum vísandi til regluna um frádráttarfríu inntøkuupphæddina, sjálvir kunnu meta, at teir ikki koma at forvinna meira enn hesa upphædd. Umsitingin setur tí hesa upphædd inn í teldukervið og full grundupphædd verður útgoldin óskerd. Tá árið er av og vanliga inntøkuumrokningin kemur fyri, vísur tað seg tó oftast, at inntøkan álíkavel er farin uppum markið. Neyðugt er at krevja av nógv útgoldnu upphæddina aftur. Afturgjaldingin skapar trupulleikar fyri pensjonistin og innkrevjingin fyri umsitingina.

Avløka av frádráttarfríu inntøkuupphæddini og tilsvarandi hækking í frádráttinum í inntøkugrundarlagnum, saman við møguleikunum fyri at samtíðarregulera pensjónina við grundarlag í upplýsingum um dagførdu inntøkuna frá fyribils skattaskránni, hevur við sær, at hesin trupulleikin verður ruddaður av vegnum.

Bæði manuelt og elektroniskt er betari at arbeiða við prosentsatsum heldur enn kr. pr. 100, serliga tá tað kemur til samtíðarreguleringar. Skotið verður upp at orða reguleringina samsvarandi hesum, also at grundupphæddin verður minkað við 60% av árliga inntøkugrundarlagnum (inntøkuni við frádráttum) heldur enn 60 kr fyri hvørjar 100, sum inntøkan fer uppum ávísa upphædd.

4.6. Inntøkugrundarlagið

At vísa seg sýnist inntøkugrundarlagið, sum pensjóns-útrokningin skal grundast á, at vera einfalt. Men ansett til praksis hevur tað skapt ógvuligu nógvan ivu, og kemst hetta í fyrsta lagi av, at so nógvar broytingar eru gjørdar í skattligu ásetanini, frádráttarmøguleikunum og viðgerðini av inntøkuni sum grundarlag fyri skattálíkningini. Hetta, uttan at støða er tikin til, um og hvussu hesar broytingar ávirka inntøku-grundarlagið í pensjónslógarinnar fatan. Umsitingin av pensjónslógunum hevur, sum vera man, altíð verið laft at skattaskrásetingunum. Tí fáa broytingar í skattaskipanini og skattaumsitingini avleiðingar fyri pensjónsumsitingina.

Í øðrum lagi eru trupulleikar og skeivleikar komnir fram seinnu árini, sum ikkeryst altíð hava verið í umsitingini av lógini. Størri krøv til nátúrunna fyrisiting, saman við betri tekniskum møguleikum fyri at loysa og retta trupulleikarnar, betri eftirlitsmøguleikar o.t. seta teir á dagsskrána.

Sum lýst frammanfyri, skulu allar inntøkur takast við í grundarlagið, sum pensjónin verður roknað eftir, undantikið tó sosialar pensjónir, barnastyrkur o.t. og barnapengar, tí teir eru samsvarandi ella minni enn barnagjaldið sb. lógina um barnagjald til einsamallar uppihaldarar. Rekstraninnvirðsbr, t.v.s. útreiðsla, sum fara til vinna, viðlíkahalda og tryggja inntøkuna, skulu dregnar frá.

Høvuðstrupulleikarnir í sambond við ásetan av inntøkugrundarlagnum fyri pensjónsútroknings eru:

skulu (nýggju) skattligu frádráttirnir takast við í inntøkugrundarlagið?

a) *upplýsingar um ognarinntøkur*
b) *ásetan av virði av naturalium*

samskipanarfrádráttarin og barnagjald áyvir normalgjaldið, ið skulu leggjast aftur inntøkuni vantandi samsvar ónillum krøv um skriseting, sum eru fyritreyt fyri tunsiting av pensjónslógini og ta skriseting, sum skattamyndugleikarnir gera.

Ad. a *Almanatastovan hevur, vísandi til viðmerkingarnar í 1970, tá reglurnar viðv. inntøkugrundarlagnum seinast vóru broyttar, hildið fast við, at tað er bruttoinntøkan uttan annan frádrátt enn fyri rekstrarútreiðslur í samband við rekstur av egnum virki, sum skal leggjast til grund fyri útrokning av pensjónum. Rekstrarútreiðslur í tátilarinnar merking kunnu ikki samanberast við núverandi skattligu frádráttirnar fyri t.d. útreiðslur av umvæling av húsum og bílum, pensjónistafrádrátt, frádrátt fyri kontúrinstup o.a.. Talan var um frádráttir, sum virki gera í vanligu rokskapinum fyri virkisrekstur og um ávís gjøld hjá løntakaran til tess at tryggja og viðlíkahalda inntøkuna.*

Samstundis hevur verið hildið fast við, at hesin frádráttur einans kundi gerast í sama inntøku, sum hann var nýttur til at vinna, tryggja og viðlíkahalda. T.v.s. at evt. hall ikki kundi dragast frá t.d. eini eftirløn, sum viðkomandi pensjónistur kundi hava samstundis. Hetta vísandi til, at útreiðslurnar ikki stavet frá eftirlønini, men vinnuinntøkuni og at evt. hall verður drigið frá í skattligum sambandi, soleiðis at tað minkar um skattin, um ikki sama ár, so árini aftaná.

Definitiónin av inntøku í pensjónslógini hevur sustatt ikki verið hin sama sum definitiónin av skattskyldugu inntøkuni. Og er helst eisini rattast at varðveita hendan skilnað framhaldandi. Tí skattalógin hevur annað endamál enn pensjónslógirnar, og verður hon m.a. nýtt til regulering av ymiskum øðrum viðurskiftum í samfelagnum, m.a. privatu vinnuni og arbeiðsmarknaðinum.

Skotið er upp, at staðfest verður, at inntøkan í pensjónslógarinnar fatan, verður skattskyldugu inntøkan uttan øðrar skattligar frádráttir enn teir, sum beinleiðis skulu til fyri av vinna, tryggja og viðlíkahalda inntøkuna, t.v.s. teir frádráttir fyri rekstrarútreiðslur, sum frammanudan eru gjørdir í uppgerðini av inntøkum (rokskapinum) hjá sjálvstøðugum vinnurekandi og ferðafrádráttur, frádráttur fyri dupult húsarhald, gjøld til arbeiðsloysisskipanina og eftirlønargjøld o.t. í lønarinntøkum.

Frádráttirnir, sum *ikki* skulu takast við, eru t.d. fyri umvæling og umbygging av egnum bústaði, konu- og barnapengar, hall av egnum virki og húsaleigu, tap av lánum og ábyrgdum til vinnuvirki, avskrivingar, o.t.

Ad. b Ognarinntøkur eru at skilja sum inntøkur av bæði fastogn og fíggjarogn ("ejendom" og "formue").

Inntøkur av fastogn kunnu vera leiguinntøkur og inntøkur, sum koma, tá fastogn er realiserað, tá sum rentuinntøkur av fíggjarognini, ið verður vunnin við sølunna. Inntøkur av fíggjarogn kunnu vera rentur, vinningsbýti ella annar vinningur av virðisbrøvum, innistandandi, útistandandi e.t. Hesar inngangna sostatt antin í skattskyldugu inntøkuna ella verða skrásettar við nýggju skrásetingum Toll & Skattstovunar av ognum.

Ásetanin av ognarinntøkum í sb. við pensjónsumsitingina hevur, burtursið frá inntøkum við útleigan, altíð verið ivasom og rettuliga ógjørlig at hava við at gera. Praksis hevur verið, at rentuinntøka verður skrásett, tá pensjónin verður viðgjørd í fyrstu sinni við støði í teirri ogn, sum pensjónisturin upplýsur at hava tá. Til fyri umleið 2 árum síðan varð ein rentuinntøka útroknað av fíggjarognini, sum svaraði til sparikassarentuna fyri vanligt innlán av teim fyrstu 20.000 kr og fyri 12 mánaðar uppsøgn av restini. Í dag verður faktiska rentan, sum hon framgongur av umsóknarblaðnum og ognaruppgerðini brúkt.

Av tí at starvsfólkaorkan ongantíð hevur gjørt tað møguligt, hevur ongin upplýsing verið, har eftirkannað verður, um broytingur eru farnar fram í ognarviðurskiftunum. Pensjónistar hava skyldu at boða frá øllum broytingum í viðurskiftum, sum kunnu hava við sær, at pensjónin verður lækkað ella skal falla burtur. Av og á koma fráboðanir um, at tær av umsitingini skrásettu rentuinntøkurnar eru ov høgar í mun til aktuella ognina og at pensjónin tí verður útgoldin við ov lágari upphædd. Fráboðanir um tað umvenda koma ikki fyri.

Rentuútreiðslur vóru til fyri fáum árum síðan ikki drignar frá evt. inntøku av innistandandi o.ø. Viðurskiftini hava, tá galdandi siðvenja varð fastlagd, ivaleyst ikki skundað undir lánøku til t.d. vanliga nýtslu ella lántøku einans við atliti til skattafyrimunir.

Í samband við fyrispurningar frá Landsgrannskoðaranum hevur Almannamálaráðið staðfest fylgjandi:

tað er faktiska rentan - og ikki ein útroknað (fiktiv) renta, sum skal nýtast
1) tað er nettorentan, t.v.s. rentuinntøkur við frádrátti fyri rentuútreiðslur, sum roknast skal við
r entan skal, eins og aðrar inntøkur, ásetast á hvørjum ári.

Í samband við 2) skal sigast, at allar rentuútreiðslur í dag verða drignar frá rentuinntøkum í nýggjum umsóknum og í teim málum, sum av einhvørji orsøk verða tikin upp til nýggja viðgerð.

Vísandi til ta orku, sum kravdist til tess at taka 8000 mál upp til mannella viðgerð einaferð um árið og til vantandi møguleikar fyri yvirhøvur at skjalprógva faktiskar rentuútreiðslur vegna ófullfíggjaðar skrásetingar, umframt óálitandi upplýsingarnar í ognaruppgerðunum, hevur ikki áður borið til at lúka krøvini, sum nevnd eru undir 1) og 3). Víst verður til kanningarnar hjá Toll & Skattstovuni, sum vístu, at ognaruppgerðin als ikki er eftirfarandi.

Av tí at innistandandi og lán í føroyskum peningastovnum og rentur av hesum í dag verður skrásett av skattamyndugleikinum, eru útlitini fyri fyrstu ferð til, at hesin parturin av inntøkugrundarlagnum kann blíva rímiliga rættur. Vinningur av útistandandi, øðrum virðisbrøvum enn føroyskum partabrøvum og rentur av útlendskum innistandandi peningi er skattskyldugur, og skuldi sostatt inngingið sum partur av skattskyldugu inntøkuni.

Vinningsbýtið av partabrøvum inngongur ikki í skattaskipanina sum persónlig inntøka, men verður avgjaldið roknað av samlaða útgjaldinum hjá útgjaldandi felagnum og tí ikki skrásett uppá persón. Treytin fyri at taka vinningsbýti við í inntøkuútrokningina er politisk avgerð um, at hetta framyvir skal skrásetast fyri hvønn persónin, ið fær slíkt. Í uppskotinum er vinningsbýtið ikki positivt nevnt í samband við uppgerð av ognarinntøkuni.

Skotið verður upp, at sum inntøkur av fíggjarognum verða roknaðar bruttorentuinntøkur við frádrátti fyri bruttorentuútreiðslur, t.v.s. uttan atlit til rentuskatt og fíggjarognaravgøld øðrumegin og hinumegin skattligan rentufrádrátt; herumframt tann vinningur av virðisbrøvum v.m. sum inngongur í skattskyldugu inntøkuna.

Ad. c Sambært galdandi reglur skal landsstýrið áseta reglur *um virði av naturalium* at leggja aftrat inntøkuni. Seinast slíkar reglur vórðu gjørdar, var í 1959. Virði varð ásett av at búgva í egnum bústað, av seyði og neytum. Virði varð ikki sett á tað, sum sjógvurin kundi geva tí, ið hevði hát. Broytingar eru ikki gjørdar síðan 1959, og er í dag onki samsvar millum ásettu upphæddirnar og veruligu virðini. T.d. varð ásett, at virði av at búgva í egnum húsum er 325 kr. um árið. Reglurnar eru ikki broyttar síðan, men verða heldur ikki nýttar av umsitingini í dag, tí ongin meining er í teimum.
Skotið verður upp at avtaka hesar reglur, soleiðis at naturalin-inntøkur einans verða tiknar við í tann mun, sum tær innganga í skattligu uppgerðina.

Ad. d Í galdandi lóg eru reglur fyri, at *samskipanarfrádrátturin*, sum verður gjørdur í tænastumannaeftirlønum skal leggjast aftrat aftur inntøkuni, sum pensiónin verður regulerað eftir. Hetta helst fyri at forða fyri, at rætturin til pensjónsviðbót varð úrslit av, at samskipanarfrádrátturin, sum skuldi mótviga fullu grundupphæddini, varð drigin frá bruttotænastumannaeftirlønini.

Nógvir stovnar og myndugleikar útgjalda tænastumannaeftirløn - bæði føroyskir og danskir. Tað hevur ikki verið gjørligt at fáa samlaðar upplýsingar frá fleiri føroyskum stovnum um, hvør fær tænastumannaeftirløn. Stovnarnir hava víst til, at upplýsing-arnar einans verða útflýggjaðir til hin einstaka persónin ella við loyvi frá honum. Úrslitið er, at ongin vísheit er fyri, at frádrátturin verður gjørdur í øllum tænastumannaeftirlønum.

Ilt er finna haldgóða grundgeving fyri varðveitslu av regluni um at leggja frádráttin aftrat, vísandi til, at ongin frádráttur yvirhøvur verður gjørdur í øðrum (sáttmálabundnum) eftirlønum. Roknað verður ikki við meirútreiðslum av hesum, tí ein tænastumannaeftirløn ikki í nógvum førum í dag er so lítil, at hon hevur við sær rætt til pensjónsviðbót, ið jú dettur burtur, tá inntøkan útyvir pensjónina er kr. 41.500 um árið hjá stokum

og kr. 64.500 tilsamans um árið hjá hjúnum. Skuldi tænastumannaløn í einstøkum dømum verið so lág, at hon hevur týdning fyri pensjónsviðbótina, so er samskipanarfrádráttur tó so lágur av henni, at hann ikki sæst aftur í heildini, hvørki hjá pensjónistinum ella í mun til heildarútreiðslumar til pensjón.
Við onnanfyri nevndu grundgevingum verður skotið upp at avtaka regluna um samskipanarfrádráttin.
Umframt samskipanarfrádráttin skal leggjast aftrat inntøkuni tann parturin av *barnagjaldinum*, sum fer uppum barnagjaldið sb. lógina um barnagjald fyri einasmallar uppihaldarar. Av tí at ongin sum helst møguleiki er fyri at fáa fullfíggjaðar upplýsingar um hetta, verður skotið upp, at reglan verður tikin burtur. Hon verður ikki praktiserað í dag, tí ómøguligt er at fáa hesar upplýsingar.

Ad. e Í umsiting av pensjónslógini er neyðugt at skilja sundur inntøkur av arbeiði og aðrar inntøkur. Fyri skattaumsitingina hevur hetta ikki týdning, tí hesar verða skattaðar á sama hátt. Sæð frá einum politiskt/búskaparligum sjónarhorni, eitt nú í metingini av búskaparligu gongdini, ætti tað at havi týdning, at t.d. eftirlønir verða skiltar frá arbeiðs- og vinnuinntøkum, soleiðis at t.d. meirúgjald í krígsskaðaendurgjøldum ikki verður tulkað sum framgongd í lønarútgjaldingum og harvið búskaparlig framgongd. Hetta fyri at taka eitt einfalt dømi.

Fyritreytin fyri eini rationellari og effektivari umsiting av pensjónslógunum er, at skattaumyndugleikin broytir sín skrásetingarhátt. Sum er verða yvirtímar í hundraðavís árliga brúktir til manuella viðgerð og umflyting av inntøkum, sum koma on-line frá skattakervinum yvir á pensjónskervið. 1000 tals mál skulu takast upp til viðgerðir av hesi orsøk við hvørja einastu ársumrokning. Arbeiðsinntøkur og tænastueftirlønir koma inn, hvørt um annað.

Arbeiðið at skilja inntøkurnar sundur og leggja tær inn í umsitingarliga rættan samanhang kostar helst meira enn tær broytingar og justeringar, sum skulu til í skattaskrásetingini og tann ómaku, eftirlønarútgjaldandi arbeiðsgevarar skulu gera sær, fyri at skilja sundur arbeiðsinntøkur og eftirlønarinntøkur. Verða 2 ymisk A-tøl nýtt í staðin fyri eitt, er spurningurin loystur.

Neyðugt er í lógini at tryggja, at tann parturin av pensjónsumsitingini, sum hevur við inntøkur at gera, er í lagi. Tí er skotið upp, at Toll & Skattstovuni verður álagt at syrja fyri at hetta verður gjørt.

4.7 Ásetan av pensjón í samband við burturgeving, uyðslandi levna v.m.

Reglan í galdandi lóg um, at pensjónin hjá einum pensionisti, sum orsakað av "ødselt eller uordentligt levned", burturgeving e.t. hevur formøblað sína ogn, skal roknast *sum tó* hann *ikki* hevði gjørt hetta, hevur verið trupul fyri ikki at siga ómøguligt at umsita. Tað er einans gjørt í málum, har umsitingin av tilvild er komin fram til hetta. Reglan er helst varðveitt fyri at forða fyri, at pensionistur tilvitað við gávum ella arvaforskotið minkar um ognina og harvið ognarinntøkuna, og sum avleiðing av hesum fær hægri pensjón.
Fíggjarognir verða sentralt skrásettar, so í tí høpinum ber til at fylgja við, um broytingar fara fram, men er talan um burturgeving av fastari ogn, sum í samband við realisering hevði sæst aftur í øktari fíggjarogn hjá pensjónistinum, men sum í tilfeldi av burturgeving verður skrásett undir øðrum navni, skal serligt eftirlit, møguliga við at inndraga skiftirættin, til. Tí er ætlanin at landsstýrið skal gera klárar reglur fyri hesum, herundir hvussu fiktiva avkastið skal roknast. Spurningurin um, hvussu hetta í praksis skal gerast er ikki avkláraður enn.

Vísast skal til, at tað ikki so sjáldan kemur fyri, at pensjonistar lata nettuliga stórar ognir - oftast fastognir - til arvingar, sum so selja tær viðari.

Skotið er upp, at reglan verður broytt soleiðis, at forða verður fyri inntøkuminking orsakað av burturgeving av ognum, men at óumsitiliga reglan viðvíkjandi uyðslutum og óriggiligum levna verður strikað.

Broytingar í inntøkugrundarlagnum í samband við pensjónsjáttan ella í árinum

Vanliga skal pensjónsútrokningin grundast á tá inntøku, pensionisturin hevði árið fyri. Fyrsta pensjónsútrokningin kann tó grundast á annað grundarlag, um inntøkuviðurskiftini eru varandi broytt í mun til

frammanundan pensjónstillutan, eins og broyting annars skal gerast, tá inntøkan varandi broytist so mikið at ein nýggj pensjónsútrokning gevur annað úrslit. Í samband við slíkar broytingar er ofta neyðugt at meta um inntøkuna framyvir.

Sum nevnt frammanfyri í samband við frádrátt fyri inntøkur í pensjónini, standast trupulleikar ofta í umsitingini av ásetan av pensjónini, sum má grundast á svingandi og óvissar inntøkur, og hevur hetta ofta óhepnar avleiðingar fyri pensionistin, tí vandin fyri at metingin av inntøkuni er skeiv, oftast ov lág, er so stórur. Úrslitið er, at hann fær ov stórt útgjald, og tí skal gjalda aftur.

Hesin trupulleiki kann loystast, um so er, at heimild verður í lógini at samtíðarregulera pensjónina. T.v.s. at útgjaldið hvønn mánaða verður heft av teirri inntøku, sum hevur verið mánaðan fyri. Samtíðarskrásetingin sum skattamyndugleikin ger, hevur skapt møguleikar fyri hesum.

Viðmerkjast skal, at tað eru nógvir pensionistar, sum rokna við, at hetta er tað, sum longu verður gjørt. Tí boða teir ikki frá broytingum í inntøkuni.

Skotið er upp, at heimild verður givin í lógini fyri slíkari samtíðarregulering.

4.9. 20%'s frádráttur

Í galdandi lóg eru reglur um at mótrokna 20% av ávísum útgoldnum avlanis- og deyðsendurgjøldum í grundupphæddini. Eftir uppskotinum verða hesar reglur settar úr gildið. Um henda frádrátt og grundgeving fyri at taka hann av, sí hjálagda fylgisskjal 2.

4.10. Persónligt ískoyti

Skotið verður upp at heimila landsstýrinum at gera fastar reglur fyri persónlig ískoyti til ávís endamál. Í dag verða ískoyti veitt til eitt stórt tal av pensjonistum í prinsippinum "eftir meting í tí einstaka málinum" til briftur, tannviðgerð, handilstenn, o.t., sum til ber at veita eftir fastari reglum. Tankin er, at reglurnar skulu innihalda krav um ávíst egingjald, sum mótvirkar ovurnýtslu. Og at skipanin einans skal koma teimum penjonistum til góðar, sum eru ringast fyri fíggjarliga, nerri ásett, teimum, sum hava so lítla inntøku, at teir hava rætt til fulla pensjónsviðbót og so lítla ogn, at inntøkur av hesi eru ótýðandi.

Slík skipan hevur við sær stóra betran av tænastuni til pensjonistar, samstundis sum hon bøtur um rættartryggina hjá pensjonistum í og við at veitingarnar verða samlíkar fyri øll og vitanin um tær verður meira útbreidd. Harumframt fer reglan at hava við sær møguleika fyri nógv einfaldari umsiting.

Sí dømi um slíka skipan frá danskari kommunu, har hon verður umsitin smidligu við einum árligum "serviceskorti" til pensjonistar, sum lúka fíggjarligu treytirnar, sí fylgisskjal 3.

4.11. Avleiðing fyri pensjónina við innleggjan á sjúkrahús

Fyri at javnseta psykiatriskar og somatiskar sjúklingar, verður skotið upp, at avleiðingin fyri pensjónina hjá pensjonistum, sum eru innlagdir í meira enn 6 mánaðar á vanligt sjúkrahús kann verða hin sama sum fyri pensjonistar, sum liggja á psykiatriskari deild, um viðkomandi má metast sum røktarsjúklingur ella má metast sum óegnaður til varandi útskriving til heimið, men enn ikki er komin á stovn.

4.12. Gjald fyri stovnsuppihald

Orsakað av at umsitingin av galdandi reglum um útrokning av gjaldið fyri uppihald á elliis- og røktarheimum í nøkrum, ítøkiliga tveimum, málum gav tað óhepna úrslit, at pensjonisturin kom at gjalda eina hægri upphædd í stovnsgjaldi og skatti tilsamans enn faktisku inntøkuna, og tí kom at brúka part av ognini sum gjald,

varð í kunngerð frá landsstýrinum, galdandi frá 1. apríl 1993 ásett, at gjaldið skuldi útroknast við støði í nettoinntøkuni, t.v.s. inntøkuni, tá skattur og avgjøld vórðu drigin frá.

Seinni hevur ivi stungið seg upp, um henda kunngerðin er heilt í tráð við lógarásetingina, tí í pensjónslógarinnar fatan verður inntøkan roknað sum bruttoinntøku, also uttan frádrátt fyri skatt.

Kunngerðin hevur annars við sær ógvuliga stórar trupulleikar umsitingarliga. Nettoinntøkuásetingin hevur havt við sær tvørleikar, sum standast av at rokna "fiktivar" skatta- og avgjaldsupphæddir av eftirlønarinntøkum, krígskaðuendurgjøldum og (framtíðandan óvissum) rentuinntøkum.

Harumframt hevur avleiðingin av ásetingunum í kunngerðini verið, at nógvir pensjonistar, sum hava rettuliga stóra inntøku við síðuna av pensjónini, lítið og einki gjalda fyri uppihaldið longur.

Skolið verður upp, at farið verður aftur til upprunaliga útrokningarháttin, men at gjaldið verður ásett til hægst 50% í staðin fyri hægst 60%, meðan reglan um, at burturdømi pensjónsparturin skal takast við (frádragast) í útrokningini, verður sett úr gildi. Í lógini verður tryggjað, at ongin kemur í ta støðu, at hann skal brúka av evt. uppsparing ella lívknandi fyri at gjalda fyri uppihaldið. Og at ongin kemur at gjalda meira enn stovnsrøktin kostar. Reglurnar verða gjørdar strangari út frá tí sjónarmiðið, at tað verður bildið rímiligt, at ein persónur, sum kemur undir almenna røkt, skal gjalda fyri hesa í tann mun, viðkomandi hevur ráðini til tess.

Ein upphædd at dekka útreiðslur til persónliga tørv pensjonistsins - lummapeningur - verður framhaldandi, uttan mun til inntøkur, at útgjalda til øll við fullari upphædd.

Sum er inngangur gjøld fyri uppihaldið til tað einstaka ellis- og røktarheimið, og kann hetta tí koma at virka sum ein meirjáttan. Hetta kann hava við sær óheptnar fylgir, tí tað inniber, at tað best kann svara seg fyri heimini at taka fólk inn, sum hava inntøkur, t.d. eftirlønarinntøkur.
Fíggjarætlan fyri hitt einstaka heimið verður løgd uttan atlit til inntøkum frá gjaldandi fólki, tí verður skotið upp, at gjøld verða kravd inn av Gjaldstovuni og harvið inngangur sum inntøkur til landskassan.

Fyri at forða fyri, at pensjónslógin kemur at standa í vegin fyri, at alternativir fíggingar- og gjaldshættir verða royndir á røktarøkinum, verður skotið upp, at heimilað verður landsstýrinum at sleggja burtur frá reglunni um, at pensjónin skal detta burtur, í samband við ávísar royndarskipanir. Og at landsstýrið ásetur reglur um gjald o.t., umframt hvussu leitigi ein royndarskipan skal kunnu koyra.

4.13. Umsitingarnyndugleikar

Sambært galdandi lógir skulu umsóknir kannast og í ávísan mun tilráðingar gerast av kommunustýrinum, áðrenn tær verða sendar víðari til viðgerð á Almannastovuni ella Vanlukkutryggingarráðnum.

Hendan skipan hevur, serliga seinnu árini, ikki riggað vel. Fleiri kommunur hava meira verið ein fløskuhálsur í mannagongdini. Tær upplýsingar, kommununar fyrr lótu í umsóknini, fáast nú frá Toll & Skattstovuni, Landsfólkayvirlitinum og øðrum nyndugleikum.

Nakrar kommunur hava onga umsitingarorku yvirhøvur, og tað kemur ofta fyri, at ongin kommunustýrislimur er at hitta, tá umsóknir skulu latast inn, ella Almannastovan hevur fyrispurningar í samband við eina umsókn.

Almannastovan hevur nú skrivstovur í Norðoyggjum, Eysturoy og Suðuroy og viðtaludagar í Vágum, og hevur ætlanir um at hava viðtaludagar í - í hvussu so er - Sandoy aftrat. Tað er sjálvsagt ein fyrimunur, at fyrispurningar viðvíkjandi umsóknum, ráðgeving og leiðbeining í samband við yvirgongd til pensjón o.a., verður viðgjørt av teim serkønu, sum manna hesar deildir.

Men brúk er fratnvegis fyri kunnleikanum hjá bý- og bygdaráðum í ávísan mun, tí tað snýr seg um lokal viðurskifti. Tí eigur teirra lutur ikki at forsvinna, men broytast samsvarandi hesum.

Í samband við tillutan av pensjón til einkjur og til einsamallar kvinnur 50 ár og eldri, skal, fyriuttan tilráðing frá kommunustýri, eisini úttala frá sýslumanni (í Tórshavn fútanum) til, áðrenn støða kann takast. Fá duga í dag at síggja grundina til hesa reglu.

Kommunutilráðingin verður oftast latin sum ein "verður viðmæld" ella "ongin viðmerking" til umsóknina; sama er við úttaluni hjá flestu sýslumonnunum.

Í samband við tillutan av framskundaðari fólkapensjón eftir galdandi reglum skal landsstýrið, aftaná tilráðing frá Vanlukkutryggingarráðnum, taka avgerð.

Eftir vanligum nútímans umsitingarsið tekur ovasti politiskt/ administrativi myndugleikin ikki lut í avgerðum um einstaklingamál.

Almannastovan er, við sínum fakútbúgna starvsfólki, før fyri at meta um eina pensjón, ið skal grundast á sosialu heildarstøðuna hjá viðkomandi umsøkjara.

Skotið er upp, at Almannastovuni verður álagt at átaka sær tann leiklut, sum kommununar sambært galdandi lóg hava, t.v.s. at taka ímóti og kanna umsóknir, gera tilráðing um avlamispensjón og taka avgerðir um sosialt treytaðu fyritíðarpensjónirnar. Og at Vanlukkutryggingarráðið framvegis tilkennir pensjón, grundað á varandi likamligt/sálarligt avlamni.

Av tí at mett verður, at hepnast hevði verðir at lata eitt av fyrisitingini óheft ráð taka avgerðir um allar pensjónir, og at hetta ráð samstundis kemur at taka avgerðir um endurbúvingarfyriskipanir, verður skotið upp, at heimilað verður landsstýrinum at flyta hesar heimildir til eitt ráð, sum verður upprættað av landsstýrinum, so skjútt sum neyðugu kanningarnar og fyrireikingarnar eru gjørdar hesum viðvíkjandi.
Hugsanin er, at ráðið skal vera samansett av fak- og leikfólki. Fakliga skal ráðið vera mannað við einum juridiskt, einum læknaliga og og einum osialfakligum serkønum. Landsstýrið útnevnir somuleiðis 3 leikfólk til ráðið. Umboðini í ráðnum hava ikki starv í sosialu umsitingini.

Ætlanin er, at skrivstovufunktiónirnar skulu liggja á Almannastovuni og at ráðið heldur sínar fundir har.

5. FÍGGJARLIGAR AVLEIÐINGAR

Sambært útrokningum Almannastovunar, sí fylgisskjal 4, verða fíggjarligu avleiðingarnar av uppskotinum mettar at verða:

Meirkostnaður:		*Minnikostnaður*	
Grundupph.: 67-69 ár	*2.663.904,-kr*	*Hjúnarhandsviðb*	*247.000,-kr*
20%'s frádráttur	*269.000,-kr*		
Lægsta fyritíðarpens.	*2.623.000,-kr*		
Barnaviðbót (-heila)	*292.500,-kr*		
Avlamisviðbót	*267.200,-kr*		
Einkjupensjón	*105.000,-kr*		
Tilsamans	*6.220.604,-kr*	*Tilsamans*	*247.000 kr*

Umframt nevndu meirkostnað kemur tað, at grundupphæddin ikki longur verður javnað eftir umtøku hjá fólkapensjonistum 67-69 ár, at hava við sær, at nakrir pensjonistar fara at koma inn í skipanina, sum ikki eru við í dag. Mett verður ikki, at talið er stórt.

Umframt nevndu sparingar (minnikostnaðin), koma sparingar av aldursviðbótini (4,3 mió yvir eitt áramál) og bíðiviðbótin (172.000 kr yvir eitt áramál) og á forsorgarøkinum av at lægsta avlamispensjón verður hækkað, umframt av at pensjón ikki verður veitt til børn framyvir.

Nýggj tøknitúgerð, sí niðanfyri, verður mett at fara at kasta umleið 4 mió. Kr.

6. UMSITINGARLIGAR AVLEI_INGAR

Arbeiðsorka

At pensjónsskipanin verður einfaldari at umsita hevur við tíðini við sær, at minni orka skal nýtast til at umsita sjálvar veitingarnar. Verður edv-kervið tíðarhóskandi og nóg nógv tíð sett av til fyrireikingar, t.v.s. til hjá landsstýrinum at gera kunngerðir, leiðbeiningar, oyðibløð o.s.fr., áðrenn lógin verður sett í gildi, verður mett, at tørvurin á starvsfólki til sjálvu pensjóns-veitingarnar verður væl minni enn í dag.

At kommunustýrini fara úr skipanini hevur við sær, at ein ávis orka skal nýtast av tí, við nýskipanini spardu, av Almannastovuni til tær uppgávur, kommunurnar hava havt.

At Almannastovan skal gera tilráðing í samband við umsóku um fyritíðarpensjónir, áðrenn tær verða sendar til Ráðið og at pensjón ikki verður veitt, uttan so at roynt er frammanundan at finna arbeiði ella at endurskapa arbeiðsførið hjá persónum (einkjum og einsamallum kvinnum) sum áður hava fingið eina pensjón uttan hesa treyt, hevur við sær meirarbeiði.

Sumanumtikið verður mett, at avleiðingin av lógaruppskotinum verður status quo, hvat starvsfólkatørvi á Almannastovuni viðvíkur. Sí nærri í viðmerkingunum til tær einstøku greinirnar frá Almannastovuni hesum viðvíkjandi í fylgisskjali 6, har komið verður inn á viðurskifti, ið hava við sær meirarbeiði. Almannastovan kemur tó ikki inn á minniarbeiði, sum stendst av einfaldgeringini, nágreiningini og betri samskipanini við skattalógina, sum lógaruppskotið hevur við sær.

6.2. Tøkniútgerð

Edv-útgerðin á Almannastovuni virkar langt frá nøktandi. Hon er gomul, krevur nógvar bæði smáar og stórar bætur fyri yvirhøvur at kunna nýtast forsvarliga sum er og hon er ikki dimensionerað til brúkaratørvin.

Mett verður neyðugt at keypa nýggja útgerð og at forrita pensjónsskipanina av nýggjum, at nýggj kravfesting til skipanina verður gjørd og at umprogrammering fer fram frá botni av. Arbeiðið við forritan má gerast av sakkønum uttanífrá. Kravfestingaruppgávan kann gerast av kønum í umsitingini.

Metti kostnaðurin av at skifta út edv-skipanina er umleið 4 mió. Kr.

Sí nærri í viðmerkingunum frá Almannastovuni hesum viðvíkjandi í fylgisskjali 5.

VIÐMERKINGAR FRÁ UMMÆLANDI STOVNUM, FELØGUM OG RÁÐUM

Lógaruppskotið varð sent til ummælis á Almannastovuni, Vanlukkutryg-gingarráðnum, Toll- & Skattstovu Føroya, Sosialráðgevarafelag Føroya, Eldraráðnum, Ráðnum fyri Brekað, Føroya Kommunufelag, Tórshavnar Kommunu, Klaksvíkar Kommunu, Runavíkar Kommunu og Grann-skoðanardeild Landskassans, og eru ummæli komin frá teim flestu.

Ummælini hava í ávísan mun havt við sær, at ásetingar eru broyttar samsvarandi tilmælum frá teim ummælandi. Dentur verður av Almannastovuni, Tórshavnar kommunu og Ráðnum fyri Brekað lagdur á, at góð tíð verður sett av til fyrireikingar, áðrenn lógin verður sett í gildi, t.v.s. at kunngerðir, leiðbeiningar, oyðibløð o.a. eru til taks fyri umsitingina, áðrenn lógin fær gildi og at tøkniútgerðin er soleiðis, at lógin í øllum, sum til ber, kann umsitast rætt og forsvarliga elektroniskt.

Niðanfyri verða tilmæli um innihaldsligar broytingar frá ummælandi stovnum og ráðum lýst, sum ikki eru tikin til eftirtektar í endaliga uppskotinum. Sí annars nærri í fylgisskjali 6.

Almannastovan
leggur dent á, at tøkniliga tillagingin, trygdin viðvíkjandi samskipan við Toll & Skattstovuna um inntøku-

grundarlagið og fremjan av lógini í samband við ásetan av inntøkuni, umsitiligheitin viðvíkjandi regluni um burturgeving av ogn og neyðugar broytingar í skrásetingarlógini/-eftirlitinum, eru í lagi, áðrenn lógin verður sett í gildi.

Annars hevur stovnurin hesar viðmerkingarnar til innihaldið í uppskotinum:

mett verður ikki, at einkjur og einkjumenn eiga at hava framfjáraett frammum onnur einsamøll, at henda pensjón yvirhøvur átti at verði tikin burtur, vísandi til sosialu avleiðingarnar av pensjonering, eitt nú avbyrging. Stuðul eigur í staðin at verða latin til endurbúgving o.a. mennandi tiltøk fyri at gera viðkomandi fíggjarliga sjálvbjargnan (hetta, at endurbúgving e.a. er mett útlitaleys ella sum órímiligt krav í mun til eitt nú bústað og aldur er í uppskotinum treyt fyri tillutan av pensjón),

pensjónsútreiðslurnar áttu at verði býtar øðrvísi, soleiðis at tey, sum eru ringast fyri fáa meir í sín part enn tey, sum eru betri fyri, hetta til dømis við at lækka grunduppheddina og hækka pensjónsviðbótina,

grunduppheddin átti at veri eins fyri øll, bæði gift og støk. Ein serlig viðbót átti at verði latin til reelt stakar persónar,

- at hægsta og miðal fyritíðarpensjón átti at kunna lutast til persónar upp til 67 ár, mótvegis nógaldandi 60 árunum,

óarbeiðsførisviðbótin til hægstu pensjón verður strikað,

Vanlukkutryggingarráðið átti at tiki avgerð um samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum, og ásetingarnar um hesa áttu at staði í pensjónslógini,

tvier barnaviðbøtur áttu at verði goldnar, tá báðir hjúnafelagarnir eru pensjonistar,

lummapeningur átti at verði veittur við tí hægu upphæddini upp til 67 ár í staðin fyri, sum nú, upp til 60 ár, og at lummapengarnir til yngri átti at verði hægri enn ásett er í galdandi lóg og uppskotinum

ásetingin viðvíkjandi uppihaldsupphædd, áðrenn gjald verður ásett í samband við innleggjan á eflis- og røktarheim, átti at verði broytt soleiðis, at tryggjað verður skal heimabúgvandi hjúnafelagnum "rímilig" kor, mótvegis ordingini í uppskotinum, sum tryggjar sama kor sum frammanundan, og

mælt verður frá at flyta heimildina at avgera pensjónir frá Almannastovuni og Vanlukkutryggingarráðnum til eitt nýstovna ráð, vísandi til at skipanin virkar rímiliga vel sum er.

Vanlukkutryggingarráðið

metir ikki, sum fleiri aðrir ummælarar, at heimildin sum kærurætur, undir núverandi umstøðum, eigur at verða flutur frá danska kærustýrinum til føroyska kærunevndina í almannamálum. Hetta er í endaliga uppskotinum tikið aftur.

Tórshavnar kommuna

hevur niðanfyri standandi viðmerkingar og tilráðingar:

tryggjað eigur at verða føroyingum, sum nøkur ár hava verið búsitandi í londum, sum ikki eru umfatað av norðurlendsku konventiónini, fulla føroyska pensjón (frávíkjan av innvinningarprinsippinum), og eigur annars í lógini at verða álagt umsitingini at hjálpa fólki við at søkja pensjón í londum, tey hava havt fastan bústað,

sami frádráttur í inntøkugrundarlagnum hjá fyritíðarpensjonistum óansað, um talan er um arbeiðs- ella aðrar inntøkur,

heimilað eigur at verða landsstýrinum møguleikin at flyta partar av umsitingini til kommununnar, hetta við atlitið til ein komandi kommunureform, og

Vanlukkutryggingarráðið eigur eisini at boða kommununum, ið hava sosiala umsiting, frá avgerðum um pensjón o.a., sb. § 56.

Føroya Kommunufelag

mælir til at avtaka reglurnar um, at kommununnar skulu gjalda part av almannaútreiðslunum, útreiðslum tær onga ávirkan hava á.

Eldraráðið

hevur ikki broytingaruppskot nú, men fer møguliga at koma við uppskotum, tá lógin hevur virkað eina tíð.

Ráðið fyri Brekað
hevur hesi broytingaruppskot:
nr. 1 og nr. 2 í § 2, stk. 1 áttu at verði býtt um
børn undir 18 ár, ið eru avlamin/brekað áttu at havi møguleika fyri eini fyribils pensjón, til veruligt endurbúgvingartilboð fyrilá. Tó samd í prinsippinum í uppskotinum,
- stakir uppihaldarar áttu at fingi barnaviðbót sjálvt um teir fáa barnagjald ella hava rætt til eitt tílíkt sb. lógina um barnagjald til einsamallar uppihaldarar,

allir pensjonistar áttu at fingi pensjónina útgoldna, eisini fólk á ellis- og røktarheimum, og skuldu øll so goldi fyri seg á stovnum o.t.
brúkaraumboð eiga at sita í einum ráðið, ið tekur avgerð um pensjón.

Toll & Skattstova Føroya
hevur ikki beinleiðis viðmerkingar til uppskotið, men greiður frá hvørjar upplýsingar stovnurin skrásetur, hvussu og nær. Viðmerkingarnar hava ikki givið høvi til stórvegis broytingar í uppskotinum, men verða hentir upplýsingar í arbeiðnum við kunngerð um ásetan av inntøkugrundarlagnum. Tó er uppskotið broytt soleiðis, at vinningsbýti, sum varð positivt nevnt í útkastinum til uppskot, ikki verður nevnt í endaliga uppskotinum, tí hetta ikki er skrásett uppá persón.
Toll og Skattstovan vísur annars á, sum Almannastovan, at Almannastovan hevur loyvi til at fáa upplýsingar frá T&S við nýtslu av P-talinum, men at hon ikki hevur loyvi til at nýta hetta í samkoyring av upplýsingum í sínum egnum skráum! Hetta sambært skrásetingareftirlitið.

II. VIÐMERKINGAR TIL EINSTØKU GREINIRNAR

§ 1:
Í greinini verður víst til, eftir hvørji heimild lógin er givin út: rammulógini fyri almannaveitingar í Føroyum.

§ 2:
Nýggj grein, sum lýsir hvat hugtakið pensjón umfatar í lógarinnar týdningi: fólkapensjón, fyrítíðarpensjón og viðbøtur eftir kap. 2 og 11, also ávísar veitingar. Ein *pensjonistur* er ein persónur, ið fær onkra av hesum veitingum. Ein persónur, sum fær *avlamisveiting* ella *lummapengar* er sostatt *ikki* pensjonistur. Heldur ikki er persónur, sum ikki longur fær veitingar eftir lógini, t.d. orsakað av høgari inntøku, pensjonistur. Ásetingin hevur samstundis við sær, at avlamisveitingin ikki kemur undir reglurnar um innvinnan v.m. T.v.s. at avlamisveitingin verður latin eftir treytunum í § 3 og verður ikki partur av teim veitingum, konventiónin umfatar.

§§ 3-8:
Ásetingarnar svara til §§ 1-2 d í galdandi fólka- og avlamispensiónslógum. Undantikið tó § 2 (uttan bókstav) í báðum lógum, sum er flutt yvir í kapitul 2, § 3 inniheldur, í mun til galdandi áseting, ta broyting, sum fylgir av uppskotinum um, at pensjon í framtíðini ikki verður veitt børnum, sí almenna viðmerkingarnar.
Frávik eru gjørd fyri reglurnar í § 2, stk. 1 um 3 ára fastan bústað í Føroyum og heimarætt í danska ríkinum sum treyt fyri at fáa pensjón, í teirri løtu Føroyar hava undirskrivað eina konventión, sb. stk. 2. Føroyar eru sum partur av Danmark við í enska, franska, vesturtýska sáttmálanum, sum undir ávísum treytum, geva statsborgarum í hesum londum rætt til føroyska pensjón og føroyingum (donskum ríkisborgarum) rætt til pensjón í Stórabretlandi, Fraklandi og Vesturtýsklandi.

Reglurnar um upptjening o.a. komu í gildi pr. 1. januar 1995 sum tillaging til "Nordisk konvention om social sikring", sum Føroyar samtyktu at taka undir við og hava undirskrivað 8. juli 1994. Reglurnar í forsorgarlógini um einkjupensión, sum eftir galdandi lóg ikki hava verið umfattaðar av konventiónini, koma við hesum uppskoti at verða umfattaðar.

Reglurnar um innvinnan av pensjón eftir bústaðar- og arbeiðstíðarskeiðum eru við norðurlendsku konventiónini gjørdar eins fyri øll norðurlond. Í fyrsta lagi hava reglurnar við sær, at pensjón skal roknast í mun innvinningartíðina, t.v.s. tá tíð ein hevur búið ella arbeitt í einum norðurlandi. Hevur ein búð í fleiri

norðurlondum, fær ein pensjón í hvørjum landi sær.

Í øðrum lagi skal ein sosial pensjón kunna tillutast og útgjaldast til ein norðurlendskum umsøkjara, sum hevur búð fast ella starvast í Føroyum, hóast hann býr í einum øðrum Norðurlandi ella í einum landi, sum er limur av EØS.

Pensjónirnar verða útroknaðar eftir reglunum í hvørjum norðurlandi sær, og hevur hetta við sær, at ein føroyingur, sum hevur búð t.d. í Svøríki, kann fáa pensjón buðuni við síðuna av føroyska pensjónini, uttan at hendan verður lækkað í mun til fulla føroyska pensjón. Somuleiðis skulu føroyingar gjalda pensjón til ein norðurlending, sum býr í øðrum norðurlandi ella í einum landi innanfyri EØS-økið, um hann áður hevur havt fastan bústað ella starvast í Føroyum.

Millum Føroyar og hinar ríkispartarnar eru reglurnar higartil framvegis galdandi. T.v.s. at ein føroyingur, dani ella grønlendari hava rætt til pensjón, útroknað eftir reglunum í tí ríkisparti, viðkomandi býr.

Ásett verður, at full fólkapensjón er treytað av fastum bústaði í ríkinum í minnst 40 ár og at pensjónin fyri persónar, sum síðan fylta 15. árið hava havt fastan bústað í ríkinum í minni enn 40 ár, verður ásett í mun til, hvussu nógvar fjørituindapartar viðkomandi hevur havt fastan bústað her.

Somuleiðis verður ásett, at full fyritíðarpensjón er treytað av longdini av bústaðartíðini frá fylta 15. árinum til dagfestingina fyri tillutun av pensjón. Hendan er sett til 4/5, vísandi til, at 40 ár av 52 (67-15) teoretiskt møguligum árum er 40/52 ella umleið 4/5. Eisini hendan bústaðartíðin verður uppgjørd í fjørituindapørtum.

Íverstandi fjørituindapartarnar verður roknað við, at ein persónur, ið ikki fær fulla pensjón, hevur innvunnið í øðrum landi. Hugsast kann í hesum sambandi, at ein føroyingur kann hava búð í einum landi, sum sáttmáli ikki er gjørdur við, og at hann ikki tey árini, hann hevur verið burturstaddur, hevur vunnið sær pensjónsrættindi í viðkomandi landi. Í slíkum førum eigur at verða mett um, um viðkomandi skal hava eitt personligt ískoyti til pensjónina upp til fulla pensjón. Tá verður sostatt hugt uppá líggjarligu viðurskiftini (inntøkur og ogn) hjá viðkomandi, til tess at meta um tað neyðuga í slíkum personligum ískoyti.

§ 9:
Í greinini verður staðfest,hvørjar sosialu pensjónirnar eru.

§ 10:
Í greinini verður treytin fyri at fáa fólkapensjón ásett til 67 ár og er greinin samsvarandi ásetingini í § 2, stk. 1, nr. 1 í galdandi fólkapensjónslóg.

§ 11:
Í greinini verður aldurstreytin fyri at fáa rætt til fyritíðarpensjón ásett til persónar millum 18 og 67 ár og svarar ásetingin til § 2, stk. 1 í galdandi avlamispensjónslóg við broyting frá 15 til 18 ár, sí almennu viðmerkingarnar viðvíkjandi pensjón til børn.

§ 12:
Í greinini verða ásettar nærri treytir fyri at fáa hægstu fyritíðarpensjón og eru hesar samsvarandi ásetingunum í § 3, stk. 1 og 2 í galdandi avlamispensjónslóg. Í staðin fyri vinnuføri, á danskum "erhvervsevne", verður í hesi lóg nýtt heiti *arbeiðsføri*. Ongin innihaldslig broyting er ætlað við nýggja hugtakinum. Aldurstreytin fyri játtan av pensjón á hægsta og miðal støði, sb. § 11, er, at viðkomandi ikki hevur fylt 60 ár, og er grundgevingin fyri hesum, at tíðin til viðkomandi skal liva av fólkapensjón er so stutt, at óheppi kann verða at áseta pensjónina á ov høgum stigi so seint, heldur enn at laga hana til seinni lækkingina, sum verður, tá viðkomandi sum 67 ára gamal kemur at liva av fólkapensjón.

§ 13:
Í greinini verða ásettar nærri treytir fyri at fáa miðul fyritíðarpensjón, og svara hesar til ásetingarnar í § 3, stk. 1 og 3, § 2, stk. 2, 2. pkt. í galdandi avlamispensjónslóg og § 27, stk. 1 í galdandi forsorgarlóg (einkjupensión) við teirri broyting, at pensiónin kann veitast til bæði einkjur og einkjumenn. Sí annars viðmerkingarnar til § 12.

§ 14:
Í greinini verða ásettar nærri treytir fyri at fáa lægstu fyritíðarpensjón og eru hesar samsvarandi ástingini í § 3, stk. 1 og 4 í galdandi avlamispensjónslóg, § 27, stk. 2 í galdandi forsorgarlóg, , § 2, stk. 2 í galdandi fólkapensjónslóg og annars, hvat aldurstreytum viðvíkur, er upprunin ásetingarnar í § 2, stk. 1, nr. 2, 3 og 4 og § 2, stk. 2 í galdandi fólkapensjónslóg.

Uppskotið inniber tó í mun til galdandi lóg hesar broytingar: 1) at "tørvspensjónin", sum sb. galdandi reglur kann veitast til einsamallar kvinnur yvir 50 ár, einkjur í framhaldi av vanligu einkjupensjónini, tá treytirnar fyri slíkari ikki longur eru loknar og persónar annars yvir 60 ár, sum orsakað av viknandi heilsu, vantandi vinnumøguleikum ella øðrum serligum umstøðum, metast at hava ein varandi forsorgartørv, eftir uppskotinum kann veitast til *allar* persónar - bæði kvinnur og menn - sum lúka treytirnar, 2) vanligi pensjónsaldurin - 67 ár - verður at galda fyri øll, eisini einsamallar kvinnur og kvinnur, giftar við pensjonistum, sum í dag hava fólkapensjónsrætt, tá tær fylla 62 ár og 3) rætturin til pensjón áðrenn vanligan pensjónsaldur verður avmarkaður til tey, sum út frá eini døming av heilsu, vinnumøguleikum og øðrum serligum umstøðum, verða metti at hava tørv á varandi fíggjarligum stuðli.

§ 15:
Í greinini verður staðfest, at miðal og hægsta fyritíðarpensjón hvørki kann hækkast ella lækkast til minni stig ella takast aftur aftaná 60 ára aldur. Ásetingin er samsvarandi ásetingini í § 2, stk. 2, 1. pkt. í galdandi avlamispensjónslóg

.
§ 16:
Í greinini verður ásett , hvørji viðurskifti, útyvir heilsutreytirnar, metingin, sum liggur til grund fyri avgerð um fyritíðarpensjón vegna avlamni, skal umfata. Ásetingin er samsvarandi ásetingini í § 3, stk. 5, 1.-3. punktum í galdandi avlamispensjónslóg. Hóast okkurt hugtak ikki fullt út svarar til galdandi donsku orðing, er ongin realitetsbroyting tilætlað.

§ 17:
Í greinini verður ásett, at pensjón ikki verður játtað persónum undir 60 ár, um til ber at stuðla viðkomandi persóni til fíggjarligt sjálvbjargni við at finna arbeiði, at skilja sum arbeiði, ið er í samsvarið við hansara ella hennara evnir, kreftir og persónligan og fakligan førleika, ella við at stuðla til endurskapan av arbeiðsførinum við viðgerð, endurbúgving e.a. Hetta eisini við atlitið til, hvar viðkomandi hevur og framhaldandi kemur at búgva og arbeiðsmøguleikarnar á staðnum, umfram til hvussu nær teimum 60 árunum, viðkomandi er. Ásetingin er samsvarandi § 3, stk. 5, 4. punktum í galdandi avlamispensjónslóg, men er ikki í galdandi lóg sett sum treyt fyri øðrum pensjónum undir 60 ár (til einkjur og einsamallar kvinnur).

§ 18:
Í greinini verður ásett, at fyrrverandi einkja ella einkjumaður, sum hava mist pensjónina við nýgiftu, fáa rættin aftur, um treytirnar annars eru uppfyltar, um tey verða fráskild. Ásetingin í stk. 1 samsvarar ásetingini viðvíkjandi einkjupensjónini í § 31, stk. 1 í forsorgarlógini. Stk. 2 staðfestir galdandi praksis um, nær pensjónsrætturin heldur uppat aftaná andlát pensjonistsins.

§§ 19-22:
Greinirnar er úrslit av redaktionellari broyting, har ásetingarnar um samanseting av tem ymsu pensjónunum er savnað og sett fyri seg í § 54, í staðin fyri at verða spjadd og sett saman við øðrum viðurskiftum, pensjónini viðvíkjandi. Í hesum greinum verður lýst, hvussu pensjónirnar eru samansettar. Einans heiti av upphæddini og ikki upphæddin sjálv í krónum verður, mótsatt í galdandi lóg, sett inn í greinirnar, men verða allar krónuupphæddir, bæði hvat veitingum og frádráttum viðvíkur, savnaðar í § 54. Annars svara greinarnar til samsvarandi ásetingar í § 4, stk. 1-4 í avlamispensjónslógini, § 3, stk. 1 og § 17, stk. 1 í fólkapensjónslógini og § 29 í forsorgarlógini, umfram ásetingina av upphæddi í lóg um ískoytisveiting til einkjur, § 3. Broyting er gjørd í avlamispensjónini, soleiðis at full grundupphædd og pensjónsviðbót verða ásettar í staðin fyri hálva grundupphædd og hálva avlamisviðbótina fyri *lægsta* avlamispensjón. Hetta viðfører samstundis eina reduktión av upphæddum frá 5 fyri grundupphædd og 5 fyri avlamisviðbót (út frá ymsum kombinatiónum av pensionistum) niður í 2 (treytað av um pensionisturin er giftur ella ógiftur). Gomlu heitini *avlamisviðbót* og *ískoytisveiting*, ið eru sonna upphæddir í galdandi lógum, fáa heiti *fyritíðarviðbót*. *Aldursviðbót* (§ 10 í fólkapensjónslógini) og *hjúnarlandsviðbót* (§§ 12 og 13 í ávikavíst fólka- og

avlamispensjónslógini) verða tiknar av. Viðbótin til sjúkrakassalimagjald verður løgd saman við pensjónsviðbótin.

§§ 23-24:
Ásetingarnar samsvara ásetingunum í § 3, stk. 2, § 4, stk. 1-2 og § 11, stk. 2-3 í fólkapensjónslógini og §§ 5, stk. 2 og 12, stk. 2-3 í avlamispensjónslógini, umfrumt § 29 í forsorgarlógini og §§ 2-4 í løgtingslóg um uppískotisveiting til einkjur við hesum broytingum: grundupphæddin í fólkapensjónini yvirhøvur verður veitt uttan atlit til fíggjarlig viðurskifti, t.v.s. at broytingin hevur við sær, at grundupphæddin hjá 67-69 ára gomlum ikki longur verður javnað eftir arbeiðsinntøkum. Viðvíkjandi óarbeiðsførisviðbót og fyritíðarviðbót (avlamisviðbót/uppískoytisveiting) verða galdandi reglur yvirførdar. Í staðin fyri ásetingina um frádrátt í pensjónini í kr. fyri hvørjar 100 verður prosentsatsur nýttur.

§ 25:
Ásetingarnar í greinini svara til ásetingarnar § 5, nr. 1 og § 6, nr. 1 í ávikavíst fólka- og avlamispensjónslógini við fleiri broytingum. Nýggja inntøkugrundarlagið verður seinast uppgjørda skattskylduga inntøkan uttan ávísar skattligar frádráttir samanløgd við inntøku av fíggjarogn (renteinntøka og annar vinningur av innistandandi, virðisbrøvum o.t., við frádrátti fyri rentuútreiðslum av lánum v.m.). Avkast av fastogn (ejendom) verður talt við í tann mun tað inngongur sum skattskyldug inntøka, t.d. sum leiguinntøka.

Galdandi ásetingar í litra a, 3. punktum í § 5 og § 6, nr 1 í ávikavíst fólka- og avlamispensjónslógini verða settar inn sum frádráttur í inntøkugrundarlagnum samanlagt við fyrrgaldandi frádráttarfríu inntøkuupphæddini. Litra b í áður nevndu greinum um frádrátt fyri rakstrarútreiðslur er lutvíst sama áseting sum í skattalógini og sostatt innbygt í inntøkugrundarlagið, og lutvíst ávísir frádráttir, sum inganga í skattskyldugu inntøkuna, t.d. gjøld fyri eftirlønartrygging, arbeiðsloysistrygging, ferðafrádráttur o.a.. Ásetingarnar í litra c í §§ 5 og 6 ávikavíst fólka- og avlamispensjónslógini um uppískoyti fyri tann part av uppihaldsgjøldum til børn, ið fara uppum normalgjaldið sambæt lógini um barnagjald til einsamallar uppihaldara, lella burtur, soleiðis at roknast skal við inntøkuni hjá pensjonistinum og møguligum hjúnafelaga og ikki inntøku, sum beinleiðis er ætlað børnum. Litra e í sama lógargreinum er flutt aftur í kap. 6 um ásetan, broytingar vm. Ásetingin í litra f (ásetan av virði av naturalia-inntøkum) og g (viðv. uppískoyti fyri samskipanarfrádráttin) í sama lógargreinum í galdandi lógum, verða tiknar av.

"Samhaldsfasta" arbeiðsmarknaðareftirlønin", sum skal útgjaldast í 1997 verður at draga frá í inntøkugrundarlagnum, vísandi til, at hon er ætlað at vera eitt ískoyti til fólkapensiónina. Fleiri føroyingar fara helst at fáa ATP úr Danmark, sum hevur samsvarandi endamál og tí heldur ikki skal leggjast aftrat inntøkuni, áðrenn javning av pensjónini.

§§ 7, 9 og 29, stk. 5 í ávikavíst fólkapensjóns-, avlamispensjóns- og forsorgarlógini um avleiðingar fyri pensiónsútroknningina av burturgevan o.a. eru settar inn sum eitt møguligt ískoyti at leggja aftrat inntøkugrundarlagnum, tá slíkan er sum lýst. Ásetingarnar viðvíkjandi avleiðingum av oyðsli og og óriggiligur levnað er tiknar av.

§ 26:
Ásetingarnar í § 4, stk. 1 í fólkapensjónslógini og § 5, stk. 1 í avlamispensjónslógini viðvíkjandi frádráttarfríari inntøkuupphædd og ásetingarnar í § 5 nr 2 í fólkapensjónslógini og § 6, nr. 2, 1. punktum í avlamsipensjónslógini um frádrátt í inntøkugrundarlagnum við útrokning av pensjónini, verða broyttar soleiðis at har hesar verða samanlagdar *til ein samlaðan frádrátt* í inntøkugrundarlagnum. Reglan um eyka frádrátt fyri arbeiðsinntøkur kemur at umfata *allar* fyritíðarpensjonistar og ikki einans avlamispensionistar, svarandi til, at pensjonistar millum 60 og 67 ár, sum í dag fáa fólkapensjón og einkjur og einsamallar kvinnur yvir 50 ár, sum í dag fáa pensjón sambæt forsorgarlógina, eisini koma at fáa frádráttin. Inntøkumarkið fyri at fáa pensjónsviðbót er broytt til ein frádrátt í inntøkugrundarlagnum í staðin.

§ 27:
Útroknaða inntøkugrundarlagið verður avrundað niðureftir, hetta samsvarandi ásetingunum í §§ 5 og tr. nr. 3 í fólka- og avlamispensjónslógunum.

§ 28:
Samsvarandi ásetingunum í §§ 8 og 10 í ávikavíst fólka- og avlamispensjónslógini.

§ 29:
Ásetingarnar um røktar- og hjálparviðhát svara til § 11 í avlamispensjónslógini við nýggjari áseting í stk. 2 viðvíkjandi samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima (eftir løtingslógini), sum skal forða fyri dupultveiting til sama endamál, samstundis sum klár heimild er at lata pensionistin velja at koma undir reglurnar um samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum, tá hann lýkur treytirnar, heldur enn at varðveita útgjaldið av røktar- ella hjálparviðbót.

§ 30:
Ásetingarnar um barnaviðbótina svarar til §§ 13 og 14 í ávikavíst fólka- og avlamispensjónslógini. Broytingin í ásetan av lægstu avlamispensjón hevur við sær, at barnaviðbótin verður fullt upphædd hjá hesum við. Pensjónin verður í dag útgoldin til pensionistin, men verður skattað í navni barnsins. Í stk. 5 verður staðfest í lógini, at barnaviðbótin, samsvarandi galdandi siðvenju, verður skattað í navni barnsins.

§ 31:
Ásetingarnar um veitan av persónligum ískoyti samsvara við §§ 14, 15 og 29, stk. 2 í ávikavíst fólkapensjóns-, avlamispensjóns- og forsorgarlógini, men er stk. 2, nr. 1 og 2 um stuðul til hjálpartól og umbyggingar í galdandi fólkapensjónslóg slettað, vísandi til, at sama heimild finnst í § 18, stk. 5 í forsorgarlógini, sum í praksis bæði umfatar stuðul til hjálpartól og umbyggingar, eisini til persónar við "aldersbetinget svagelighed", ið sostatt ikki útilokar fólkapensjonistar. Harumframt verður í nýggjum stk. 4 heimilað landsstýrinum at áseta fastar reglur fyri persónliga viðbót til beilivág, o.l.

§ 32:
Reglan um beinleiðis yvirgongd frá fyritíðar- til fólkapensjón er samsvarandi ásetingunum í §§ 15 og 19, stk. 3 í fólkapensjónslógini.

§ 33:
Reglan um varðveitslu av hjálpar- og røktarviðbót við yvirgongd frá fyritíðar- til fólkapensjón er samsvarandi ásetingunum í § 16 í fólkapensjónslógini.

§ 34:
Ásetingarnar um avlamisveiting er samsvarandi ásetingunum § 16 í avlamispensjónslógini.

§ 35:
Ásetingin í stk. 1 um innlatan av umsókn er samsvarandi ásetingunum í § 19, stk. 1 í fólkapensjónslógini og § 20, stk. 1 í avlamispensjónslógini við teirri broyting, at umsóknin skal sendast til Almannastovuna og ikki til kommunustýrið. Stk. 2 um umsóknir um fyritíðarpensjón er í mun til galdandi reglur nýggj ásetan í og við at Almannastovan skal gera tilráðing um pensjón, áðrenn umsóknin verður latin til ráðið. Stk. 3 viðvíkjandi krøvunum til innihald í umsóknini er samsvarandi § 19, stk. 2 í fólkapensjónslógini og § 20, stk. 2 í avlamispensjónslógini. Stk. 4 um lækna váttan er samsvarandi ásetingini í § 20, stk. 3 í avlamispensjónslógini. Stk. 5 er ásett sum avleiðing av, at Almannastovan tekur avgerð um fyritíðarpensjónir og skal í tí sambandi, eins og ráðið, sjálv taka avgerð um ávísar fyritíðarpensjónir.

§ 36:
Ásetingin um, at Ráðið hevur heimild at áleggja umsøkjaranum at viðvirka í lýsing av málinum er samsvarandi til ásetingina í §§ 18, stk. 2, 1. punktum og 26, stk. 3 í avlamispensjónslógini.

§ 37:
Ásett er, at Almannastovan og Ráðið kunnu áleggja almennum myndugleikum og øðrum at koma við upplýsinum, sum hava týdning í málsviðgerðini, og er ásetingin samsvarandi ásetingunum í § 18, stk. 1 í avlamispensjónslógini og til § 20, stk. 1 í fólkapensjónslógini.

§ 38:
Nýggj áseting, har álagt verður umsitingini at boða frá komandi broytingum í rímiligari tíð fyri broyting-

ina. Hildið verður ikki ráðiligt undir núverandi umstøðum at áleggja umsitingini at boða øllum persónum frá rættinum til fólkapensjón í góðari tíð áðrenn fólkapensjónsaldur. Tá beinleiðis elektroniskt samband er við Landsfólkayvirlitið ber til at gera hetta. At ásetingin ikki er í lógini, forðar ikki fyri, at tænastan verður veitt. Landsstýrið kann evt. gera hetta í kunngerð, vísandi til ásetanina í § 62.

§ 39:
Í greinini verður ásett, nær rætturin til pensjónsútgjald fær gildi. Stk. 1 svarar til § 22, stk. 2, 2. punktum í avlamispensjónslógini. Stk. 2 og 3 svara til § 20, stk. 4 í fólkapensjónslógini.

§ 40:
Nýggj ásetan. Praksis í dag er, at forsorgarstuðul verður veittur til pensjón verður tilkend. Síðan verður mótrokning gjørd. Mannagongdin er einfaldari, um forskot uppá pensjón kann latast í staðin, tí harvið er ikki neyðugt við umkonteringum. Samstundis verður við hesum møguleika lagt upp til, skjótast til ber, at stuðla persónum við at gera møguligar neyðugar tillagingar av fíggjarligu viðurskiftunum til støðuna sum komandi pensjonistur.

§ 41:
Í greinini verður ásett, at pensjónin verður útgoldin forút og at pensjónistar skulu boða frá bústaðarbroyting. Ásetingarnar í stk. 1 og 2 svara til ásetingarnar í § 21, stk. 1 og 2 í fólkapensjónslógini og § 23, stk. 1 og 2 í avlamispensjónslógini. Stk. 3 er nýggj ásetan, har staðfest verður, at landsstýrið ásetur nærri reglur fyri pensjónina (slag av pensjón) hjá einum persóni, sum hevur fingið (ávíst slag av) pensjón í Danmark, tá hesin flytur til Føroya.

At pensjónslógirnar verða løgtingslógir hevur við sær, at avtala skal gerast við danir um umsókn, útgjald og yvirgongd til pensjón fyri pensionstar, sum flyta ímillum Føroyar og Danmark - ein spurningur, sum verður tikin upp við Almannamálaráðið so skjótt sum nýggj lóg er samtykt, soleiðis at hesin spurningur er avgreiddur, tá lógin fær gildi.

§ 42:
Í greinini verður ásett, at Almannastovan undir ávísum serligum umstøðum kann umsita pensjónina hjá einum persóni eftir fráboðan frá einum myndugleika ella persóni, sum kennir viðurskiftini hjá viðkomandi. Ásetingin svarar til ásetingarnar í § 23, stk. 1 í fólkapensjónslógini og § 24, stk. 1 í avlamispensjónslógini. Hesar verða ógvuliga sjáldan nýttar. Mótsatt galdandi reglum, verður við uppskotinum álagt landsstýrinum at gera reglur fyri, hvussu ásetingin skal umsitast.

§ 43:
Reglan um beinleiðis flyting av sjúkrakassalimagjaldi til viðkomandi sjúkrakassa svarar tilásetingarnar í § 23, stk. 2 og 3 í fólkapensjónslógini og § 24, stk. 2 og 3 í avlamispensjónslógini. Ein pensjónistur skal, sum treyt fyri at fáa pensjón, vera njótandi limur av sjúkrakassa. Reglan um beinleiðis flyting av limagjaldinum verður nýtt, tá ein pensjonistur ikki heldur sínar skyldur mótvegis sjúkrakassanum.

§ 44:
Ásetingin í stk. 1 er nýggj og staðfestir, nær pensjónirnar verða inntøkuviðgjørdar. Stk. 2 um ásetan av fyrstu pensjónini er umorðing av, men hevur sama endamál sum §§ 5 og § 6, nr. 1 litra e í fólka- og avlamispensjónslógini. Stk. 3-6 svara til ásetingarnar í § 24, stk. 1 og 2 í fólkapensjónslógini og § 27, stk. 1 og 2 í avlamis-pensjónslógini, men umorðað og nágreinað við heimild til at umrokna/javna pensjónina mánaðarliga út frá dagførdum inntøkum hjá pensionistum, ið hava óstøðugar inntøkur, sum torført er at meta um frammanundan. Soleiðis ásettar pensjónir skulu eftirroknast árliga og evt. ov lítið útgoldið útgjaldast og ov nógv útgoldið innkrevjast, tá endaliga inntøkan er kend. Tað skal tó framhaldandi vera so í flestøllum førum, at pensjónin verður grundað á seinast álíknaðu inntøkuna sambært § 24.

§ 45:
Í greinini verður staðfest, at pensjonistar hava skyldu til at boða frá broytingum, sum hava við sær, at pensjónin lækkar ella dettur burtur. Ásetingin svarar til § 25 í fólkapensjónslógini og § 28 í avlamispensjónslógini.

§ 46:
Í greinini verður staðfest, at avleiðingin av ikki at yvirhalda fráboðanarskylduna er, at pensjónin verður kravd aftur, um neyðugt í deyðsbúnum hjá pensjonistinum. Ásetingin svarar til § 26 í fólkapensjónslógini og § 29 í avlamis-pensjónslógini.

§ 47-48:
Í greinunum verður staðfest, at fyritiðarpensjónsmál skulu takast upp til nýggja viðgerð, tá broytingar henda í inntøkuviðurskiftum, arbeiðsførinum og viðurskiftum annars sum hava týdning fyri rættin til pensjón og aðrar veitingar. Ásetingin er samsvarandi ásetingini í § 25 í avlamispensjónslógini við redaktionellari broyting, umfram broyting, sum kemur av, at Almannastovan tekur avgerð um ávísar pensjónir.

§ 49:
Í greinini verður ásett, hvussu og nær pensjónin eftir ávísum reglum fellur burtur fyri persónar, ið fáa uppihald á serforsorgarstovnum, sjúkrahúsum o.a. og svara reglurnar til §§ 27 og 30 í ávikavíst fólka- og avlamispensjónslógini, við ávísum broytingum: Álagt verður í stk. 3 landsstýrinum, umfram at gera reglur fyri, hvussu fyribaldast skal við pensjónini, tá ein pensionistur av stovnum sb. forsorgarlógina, er settur í pleygu í privatum heimum, eisini at gera reglur fyri, hvussu verður við hjálpar- og røktarviðbót, tá Almannastovan setir stuðulsfyriskipanir í verk hjá vitfevnandi líkamliga ella sálarliga brekaðum persónum, ið búgva heima. Samstundis er innført nýggj regla - stk. 5 - sum javnsetir pensjonistar, sum vegna somatiska sjúku, eru røktarsjúklingar við pensjonistar, sum vegna psykiatriska sjúku, eru tað.

Tað kemur fyri, at røktarkrevjandi pensionistar liggja í langa tíð á sjúkrahúsi, aftaná at tey, læknaliga séð, eru líðugtviðgjørd. Ein trupulleiki sýnist í førum at vera, at tað ikki er forsvarligt at útskriva tey til heimið, tí stuðulin uttanfyri, heimurøktin og avvarðandi, ikki nøktar røktartørvin og pláss ikki er á ellis- og røktarheimum. Í slíkum førum kann pensiónin falla burtur, sum gjørt verður, tá talan er um psykiatriskar sjúklingar, tá ávís tíð er gingin.

§ 50:
Í greinini verður ásett, hvussu verður við pensjónini, tá ein pensjonistur fær uppihald á røktarheimi, ellisheimið ella líknandi. Reglurnar eru samsvarandi ásetingarnar í §§ 28 og 30 í fólkapensjónslógini og § 30, stk. 8 í avlamispensjónslógini, ið vísur til nevndu greinir í fólkapensiónslógini við teim broytingum, at gjaldsupphæddin verður sett til hægst 50 % av bruttoinntøkuni, mótvegis 60% í galdandi reglum, at burturdoymað pensjónin ikki skal takast við í útrokningini av gjaldinum og at gjaldið ikki kann fara uppum eina upphædd, sum er størri enn munurin millum inntøkuna og skattin av henni. Stk. 4 er nýggj orðing av § 28, stk. 2, 2. punktum í fólkapensjónslógin, og er ætlanin her at tillaga reglunar fyri pensjonistar, sum í samband við umlætting, koma á røktar- ella ellisheim, til reglurnar sum galda, tá pensjonistar koma til umlætting á eitt nú sambýlum. Stk. 6 staðfestir, at gjøld skulu innkrevjast av Gjaldsstovuni og ikki, sum við galdandi siðvenju, av heimunum. Í stk. 7 verður, sum nýggj regla, heimilað landsstýrinum at gera undantak frá regluni í stk. 1 um at pensjónin dettur burtur og lummapengar verða útgoldnir, í sambund við royndarskipanir, har pensjónin í staðin kann verða útgoldin og pensjonistarnir gjalda fyri seg á viðkomandi stovni.

§ 51:
Í greinini verður ásett, at reglurnar um útrokning av gjaldi eftir § 50, stk. 2 ikki skulu brúkast fyrr enn tryggjað er einum heimabúgvandi hjúnafelaga, at viðkomandi kann varðveita tey livikor, familjan hevði, áðrenn hin hjúnafelagin fekk uppihald á røktar- ella ellisheimi. Barnaviðbót verður útgoldin til børn undir 18 ár hjá persónum, sum koma á stovn ella røktar- og ellisheim. Og ásett verður, at ein heimabúgvandi hjúnafelagi, um so er, at hann hevur so høgar inntøkur, at hann hevur yvirskot í mun til tað, sum skal til fyri at varðaveita livikorini higartil, samsvarandi reglunum í kapitul 1 í forsorgarlógini, kann verða settur at gjalda fyri uppihald hjúnafelagans á heiminum. Reglurnar er samsvarandi ásetingunum í § 27, stk. 3 og § 31 í fólkapensjónslógini við umorðing.

§ 52:
Í greinini verður ásett, at pensjón ikki kann gerast til mál fyri útløku ella aðrari rettarsókn, men at krav í ávísan mun kunnu mótroknast í pensjónini, tá talan er um skatt og ov nógv útgoldna pensjón. Burturseð frá stk. 4 er ongin innihaldslig broyting í mun til galdandi reglur. Í stk. 4 verður heimilað Almannastovuni at mótrokna ov nógv útgoldnar pensjón hjá pensjonisti, tá hjúnafelagin fær ellirgjald av pensjón, og

pensjonisturin í tíðarskeiðnum meðan pensjónsumsóknin verður viðgjørd hjá hjúnafelagnum, hevur fingið av nógv útgoldið, tí hann hevur verið roknaður sum stakur pensjonistur.

§ 53:
Í greinini verður ásett, at pensjón verður útgoldin til hjúnafelagan hjá einum pensjonisti, sum doyr, í 3 mánaðar aftaná tann mánaðan, andlátið hendi, um bæði hava verið pensjonistar. Ásetingin er samsvarandi ásetingunum í § 3, stk. 3 í fólkapensiónslógini og § 4, stk. 5 í avlamispensiónslógini.

§ 54:
Í hesi grein verða allar upphæddir í lógini savnaðar í eina grein. Sí viðmerkingarnar til §§ 18-21. Ein meira yvirskoðilig skipan, sum eisini ger tað møguligt við hvørja javning av upphæddunum ella broyting í veitingarstøði at broyta hesa lógargrein - og lógartekturin er altíð á-jour. Í dag standa fleiri ára gamlar upphæddir í teim ymsu ásetingargreinunum, og kann tað virka ørkymlandi fyri hann, ið leitar sær upplýsingar í lógini. Upphæddirnar til giftar og ógiftar persónar eru yntiskar við teirri grundgeving, at útreiðslufyrimunir eru av at vera tvey í mun til at avhalda eitt nú uppihaldsútreiðslur einsamallur.

§ 55-56:
Í greinunum verður ásett, hvørjir kærumyndugleikarnir eru og reglur annars, kærum viðvíkjandi. Reglurnar svara til ásetingarnar viðvíkjandi kærumyndugleikum í §§ 32 og 35 í ávikavíst fólka- og avlamispensiónslógini.

§ 57 - 62:
Í greinunum verður ásett, hvør er við í umsitingini av lógini við hvørjum uppgávum og heimildum. Nýggj regla (§ 58) áleggur skattamyndugleikanum at tryggja, at tann parturin av lógini, sum er treytaður av inntøku, kann fremjast. Sýslumaður/fútí eru ikki við í viðgerðini av pensjónsmálum og kommunustýrini og Almannastovan fáa broyttar heimildir og uppgávur í mun til galdandi lóg.
Ásetingarnar viðvíkjandi Vanlukkutryggingarráðnum eru tær somu, sum eru í galdandi avlamispensiónslóg §§ 17-26, í tann mun hesar ikki eru tiknar við undir annað kapittul, har tær, sambært innihaldið, annars verða hildnar at hóska betur.
Nýggja ásetingin í § 62, stk. 2 heimilar landsstýrinum at flyta heimildirnar hjá Almannastovuni og Vanlukkutryggingarráðnum at játta, taka aftur og broyta pensjón til eitt ráð, sum verður upprættað til endamálið.

§ 63:
Í greinini verður staðfest, hvussu útreiðslurnar til alltannamál verða goldnar. Samsvarandi ásetingunum í lógini um heildarveiting og rammulógini, umfram vísandi til galdandi reglur í løgtingslóg um býtið av almannaútreiðslunum v.m..

§ 64-65:
Í greinunum verður ásett, hvørjar lógir fata úr gildi, tá henda lógin kemur í gildi og at landsstýrið avger, hvørjar fyrisitingarligar forskriftir (kunngerðir) framhaldandi skulu hava gildi.

§§ 66 - 71:
Í greinunum verða ásettar skiftisreglur, sum lýsa hvussu verður við pensjónini hjá teimum, sum fáa veitingar sambært galdandi reglur, herímillum, har henda lóg hevur við sær, at veitingar verða mistar, at tryggjast skal teimum, sum fáa viðkomandi veitingar, at hetta heldur fram.

§ 72:
Staðfestir, nær lógin kemur í gildi. Tað er av týdningi, at tað ganga í **minsta lagi 12 mánaðar**, helst 18 mánaðar, frá tí degi, lógin verður samtykt, til hon fer gildi. Hetta soleiðis at nøkniútgerðin er fult út tillagað og royndarkoyrd, og allar kunngerðir og leiðbeiningar, sum landsstýrið skal gera, eru gjørdar, áðrenn lógin kemur í gildi.

Í viðgerð 17. apríl 1996. Málið verð beint í trivnaðarnevndina.
Fylgiskjal til skjals á løgtingsskrivstovuni.
Málið burturlottið.
F.L. j.nr. 1015-7/91.

101 Løgtingslóg um avgjøld í samband við panting

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um avgjøld í samband við panting.

§ 1. Fyri pantingar framdar av Føroya Gjaldstovu, verður kravt eitt grundgjald uppá kr. 300. Er kravið kr. 3.000 ella hægri, verður umframt kravt ½% av restkravinum í grundgjaldi.
Stk. 2. Verður pantað samstundis fyri fleiri krøv hjá sama skuldara, verða krøvini løgd saman, áðrenn avgjaldið verður roknað.
Stk. 3. Verður pantað fyri sama krav hjá fleiri skuldarum, verður avgjald roknað fyri hvønn skuldara. Hetta er tó ikki galdandi, um skuldararnir eru sambúgvandi hjúnafelagar, ella tá pantað verður í fastari ogn, sum skuldararnir eiga í felag.

§ 2. Um pantingin heilt ella partvíst verður framd uttan fyri skrivstovu pantifútans, ella skuldarin verður politiframførdur, verður eisini kravt eitt eykagjald uppá kr. 400.
Stk. 2. Verður ein av teimum í stk 1 nevndu rættargerðum framd fyri fleiri krøv hjá sama skuldara, skal bert eitt eykagjald roknast.
Stk. 3. Fyri eykagjald eru somu reglur galdandi sum í § 1, stk. 3.

§ 3. Avgjald eftir § 1 verður roknað, tá komuboðið verður sent.
Stk. 2. Avgjald eftir § 2 verður roknað, tá pantingin verður framd.
Stk. 3. Avgjøld, sum verða roknað sum ein prosentpartur, verða avrundað upp til næsta krónutal, sum kann býtast við 10.
Stk. 4. Avgjøld eftir §§ 1 og 2 kunnu bert verða roknað eina ferð fyri sama krav hjá sama skuldara.

§ 4. Avgjøld, ið ikki verða goldin beinanvegin, kunnu pantast av Føroya Gjaldstovu eftir reglunum fyri innkrevjing av skattum og avgjøldum.
Stk. 2. Avgjøld, ið ikki verða goldin beinanvegin, kunnu verða eftirhildin í A-inntøku skuldarans eftir reglunum fyri eftirhald í § 136 í samtíðarskattalógini.
Stk. 3. Føroya Gjaldstova kann í serligum førum eftirgeva avgjaldið.

§ 5. Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og samstundis fer løgtingslóg nr. 10 frá 10. aprfl 1953 um gjøld av panting úr gildi.

Viðmerkingar:

Tær lógir, sum eru galdandi fyri avgjøld í samband við pantingar framdar av Føroya Gjaldstovu - vanliga nevnt pantigjald, eru frá ávikavist 1953 og 1965, og eru ongantíð síðani tillagaðar nútíðar viðurskiftir. Hvørki tá talan er um upphæddir, tøkni ella lóggávuni í síni heild.

Seinastu tíðina hevur Føroya Gjaldstova lagt stóran dent á, at málsviðgerðin á stovninum verður so professionel sum gjørlig, og í hesum sambandi er nýggj edv-skipan tikin í nýtslu, samstundis sum stórar hygnaðarbroytingar eru framdar. Alt fyri at bøta um innkrevjingina, sum higartil lævur verið eftirbátur í føroyskari fyrisiting, samstundis sum dentur verður lagdur á at verja rættartrygd borgaranna.

Fyri at nýggi arbeiðshátturin, við tí framkomnu tøknini og tí nógv bøtta og rationaliseraða formliga grundarlagnum skal virka eftir ætlan, metir gjaldstovan tað neyðugt, at lógirnar um avgjald verða nútímansgjørdar. Eisini við atliti til tað effekt, sum slík avgjøld hava.

Lógaruppskotið tekur útgangsstøði í donsku lógini 1989-06-27 nr. 460 um "retsafgifter" við seinni broytingum "afsnit 2, kap 3" og "afsnit 6, kap. 12".

Landsstýrið ætlar at avgjaldið verður ført sum inntøka undir rakstrarstaðnum hjá gjaldstovuni. Høvuðsor-

søkin til hetta er at skapa ein automatikk millum játtan og virksemi stovnsins, sum er í tráð við arbeiðið við nýggjum budgetreglum í sambundi við fíggjarlógararbeiðið. Roknað verður við, at beinleiðis útreiðsturnar av eini panting liggja um 200 kr. Síðan koma aðrir kostnaðir sum EDV, leiðsla og skrivstovuhald. Sum eina alternativa loysn kundi verið staðfest, at gjaldstovan fekk dekkað allar beinleiðis og óbeinleiðis kostnaðir, sum standast av pantingini, og at avlopið verður fört sum inntøka undir grein 1 á fíggjarlógini.

Upphæddirnar í mágaldandi lóg eru ikki dugførdar síðum 1953, og verða upphæddirnar prístalsviðgjørdar t.d. 41,75 fyri panting á bygd við støði í prístalinum, so skuldi upphæddin í dagsprísum verið umleið 270 kr.

Ein onnur grundgeving fyri at hækka upphæddirnar er, at sum tað er í dag, so kostar tað so at siga einki at aktivera pantifútan óneyðugt - einans 30-40 kr. Nógv mál standast av lítkaselu antin tí, at borgarin ikki setur seg í samband við gjaldstovuna fyri at fáa málið viðgjørt so ella so, ella ikki rindar til tíðina. Merkir borgarin, at tað kostar ikki at hava greiðu á viðurskiftunum við gjaldstovuna, so dettur stórur parturin av lítkaseluni burtur, tí skuldarin føler eitt nógv størri trýst at fáa skipað viðurskifti við gjaldstovuna. Hetta merkir so aftur, at gjaldstovan kann miðsavna og málrætta arbeiðið enn meira móti teimum veruligu innkrevjingartrupulleiktunum.

Skipanin, sum er ein standardskipan, er forritað til teir í lógini nevndu satsir, tí kemur lógarbroytingin ikki at kosta landskassanum nakað, heldur hinvegin. Verða satsirnir ásettir øðrvísi, enn skotið upp her, so 1) kann gjøgnumførslan ikki gerast fyrr enn síðst í árinum 2) avsetast skal ein upphædd upp á einar 30-50 túsund kr. til at gera broytingarnar fyri. Tí skal gjaldstovan mæla frá, at upphæddirnar og meginreglurnar í hesum uppskotið verða broyttar.

Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

Ad § 1. Lógin hevur bert gildið fyri pantingar framdar av Føroya Gjaldstovu. Fyri at varðveita hugtakið frá gomlu tógunum, sum arbeitt verður eftir í dag verður avgjald eftir hesi lóg nevnt pantigjald. Rokningarhátturin er tann sami sum í lógini, sum í Danmark hevur heitið lovbekendtgørelse 1989-06-27 nr. 460 om retsafgifter, við seinni broytingum.
Grundgjaldið verður eisini roknað, um pantingin verður byrjað beinleiðis sum útgangandi panting.

Ad § 2. Eykagjaldið, sum er ein partur av pantigjaldinum, verður kravt við útgangandi panting og/ella tá skuldarin verður politiframførdur.

Ad § 3. Gjaldstovan viðger grundgjaldið sum falna skuld longu, tá ið komuboðið (tilsigilsi) verður sent til viðkomandi skuldara, ella útgangandi panting verður gjørd. At senda komuboðið er, at skipanin við støði í vel allýstum fyritreytum útskrivar komuboðið, sum síðan verður sent sum brev til viðkomandi. Eykagjaldið verður bert uppsett, um pantifútin ger av at fremja útgangandi panting. Útgangandi pantingar fara fram, t.d. tá ið skuldarin ikki er møttur sambæt komuboðum ella tí at pantifútin av aðrari orsøk metir hetta neyðugt.

Ad § 4. Sambæt ríkislóg nr. 40 frá 30. marts 1894 for Færøerne om udpantning m.m. er heimild at panna "gebyrer" og "afgifter". Fyri at staðfesta, hvør ið hevur útpantingarheimildina, er Føroya Gjaldstova nevnd staðiliga. Sambæt uppskotinum kann gjaldstovan eftirhalda í A-inntøku fyri ikki goldið pantigjald .

Kravið til eina eftirgeving er, at henda verður gjørd við støði í eini málsviðgerð. Dømi, um nær eitt pantigjald kann strikast, eru:

1. Um viðkomandi ikki hevur aðra skuld enn pantigjaldið. Hetta kann koma fyri t.d. tí skuldarin hevur flýggjað uppgerðirnar inn, so at mett álíkning fellur burtur .
2. Gjøld eru tilskrivað juridiskum persónum, sum eru óvirknir.
3. Skuldarin er fluttur av landinum.

Ad § 5. Gjaldstovan fær inntøkurnar, sum eru av hesi lóg.
1. viðgerð 12. apríl 1996. Málið varð beint í rettarnevndina, sum 30. apríl 1996 legði fram søljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 25. mars 1996 og varð eftir 1. viðgerð 12. apríl 1996 beint í rettarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í fýra minnilutar.

Minnilutin (Bjørn á Heygum, Sune Jacobsen og Marita Petersen) tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja tað.

Minnilutin (Signar á Brúnni og Ingeborg Vinther) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Minnilutin (Jógvan á Lakjuni) vísir á, at undir hesari samgonguni er tann almenna nýtslan bara vaksin og trýstið á borgararnar er so stórt í dag, at mong ongan útveg síggja sær.

Minnilutin heldur tað tí ikki vera rætt - tá ið hugsað verður um, hvussu støðan er í landinum, og hvussu illa mong fólk eru fyri av arbeiðsloysi o.ø. - at fara at leggja enn størri byrðar á tey, sum frammanundan kanska eru ringast fyri - í hesum løri at hækka pantigjøldini.

Skatta- og avgjaldstrýstið er alt ov stórt frammanundan, og tað er skeivt at hava øll nøgulig gjøld, sum tað almenna skal knokkroyta borgaran við. Heldur áttu vit at farið hin vegin og tikið tílík gjøld burtur.

Minnilutin (Jógvan á Lakjuni) tekur ikki undir við uppskotinum.

Minnilutin (Lasse Klein) tekur støðu í tingsalinum.

2. viðgerð 7. mai 1996. Samtykt við 13-0-11 atkvøðum at beina málið til 3. viðgerð.

3. viðgerð 14. mai 1996. Málið endaligt samtykt við 14-0-11 atkvørðum.

Løgtingslóg nr. 62, 20. mai 1996.

F.L. j.nr. 2520-43/96.

102 Løgtingslóg um eykajáttanir fyri fíggjarárið 1996

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, fram seljándandi

Uppskot

til

løgtingslóg um eykajáttanir fyri fíggjarárið 1996

Høvuðsyvirlit yvir uppskot til eykajáttanir fyri 1996

Grein	Túsund kr.	Rakstraraetlan: Útreiðslur	Rakstraraetlan: Inntøkur	Íløguaetlan	Úrslit
§ 1.	Løgtingið				
§ 2.	Meginfyrisiting				
§ 4.	Lógarmál				
§ 5.	Fíggjarmál				
§ 6.	Almannamál	2.555		650	
§ 7.	Íbúðarmál				
§ 8.	Heilsumál				
§ 9.	Útbúgving og gransking				
§ 10.	Mentan	192			
§ 11.	Umhvørvi og orka				
§ 13.	Fiski-, ali- og sjóvinna	-2.000		9.200	
§ 14.	Vinnulív				
§ 15.	Landbúnaður				
§ 16.	Samferðsla og samskifti	1.880		-1.500	
§ 17.	Arbeiðsmarknaður				
§ 19.	Eftirlønir				
	Samanlagt	2.627		8.350	
§ 30.	Rentur				
§ 35.	Skattir og avgjøld				
§ 38.	Ríkisstuðul				
	Rakstrar- og íløguaetlan (RÍ)	2.627		8.350	-10.977
§ 6.	Útlán	550			
	Rakstar-, íløgu- og útlánsaetlan (RÍÚ)	3.177		8.340	-10.977

§ 6 Almannamál

A. Yvirlit

Játtanayvirlit:

Túsund kr.	Nettotal	Útreiðslur	Inntøkur
Útreiðslujáttan	3.105	2.855	-250
Íløgujáttan	650	650	-

Felagsútreiðslur	**385**	**-**
Hjálp og røkt av eldri og brekaðum	**-380**	**-250**
Socialar skipanir	**3.500**	**-**

B. Játtanir

Felagsútreiðslur.			Útreiðslur	Inntøkur
19904/				
3733303	Landsstýrinum at ráða yvir *(Rekstrarjáttan)*	J	400	-
		EYJ	**200**	
11359	Almannastovan (Rekstrarjáttan)	J	20.665	
		EYJ	**-200**	
	Tiltøk ætlað brekaðum (**Nýtt rekstrarstað**)	**EYJ**	**385**	-
Hjálp og røkt av eldri og brekaðum				
19042	Serforsorg *(Rekstrarjáttan)*	J	47.374	2.203
		EYJ	**-380**	
19075	Røktarheim *(Rekstrarjáttan)*	J	87.799	18.483
		EYJ	**-1.200**	**-250**
Røktarheim *(Høgnjáttan)*				
(Nýtt rekstrarstað)		**EYJ**	**650**	
Lán til kommununar á Sandoynni (**Nýtt rekstrarstað**)		**EYJ**	**550**	
Sosialar skipanir				
19678	Viðbót til ávísar pensionistar *(Lógverbundin játtan)*	J	8.000	
		EYJ	**3.500**	

Viðmerkingar

Felagsútreiðslur

19904/373305 Landsstýrinum at ráða yvir

Útreiðslurnar til samsýningar verða vøntandi størri enn avhaldast kann innan játtanina. Hetta eru samsýningar í sambond við endurskoðanina av lógaruppskotinum um lógskyldugu vanlukkutrygging, og spurninginum um endaliga samsýning til Knút Nolsøe fyri arbeiði hansara í sambond við endurgjald til krígssiglarar. Meirútreiðsla uppá kr. 200.000.
Eykajáttanin viðførir ikki øktar útreiðslur fyri landskassan, tí upphæddin verður flutt frá rekstrarstað 11359 Almannastovan.

Budgettsundurgreining

tús. kr.	J	EYJ	J+EYJ
Útreiðslujáttan	400	200	600
Útreiðslur	**400**	**200**	**600**

Tiltøk ætlað brekaðum

Upphæddin svarar til ta miðal upphædd, sum Grunnurin ætlaður brekaðum, ið væntandi verður avtikin í næstum, hevur fingið úr Happadráttagrunninum 4 tey seinastu árini.

Nýtslan av hesum rakstrarstað er tí treytað av, at løgtingið samtykkir lógaruppskot landsstýrisins um avtøku av landskassagrunnum.

Budgettsundurgreining

tús. kr.	J	EYJ	J+EYJ
Útreiðslujáttan	-	385	385
Útreiðslur	**-**	**385**	**385**

Hjálp til røkt av eldri og brekaðum

19042 Serforsorg *(Rakstrarjáttan)*

Kr. 380 tús. verða fluttar til § 16, serflutningsskipan.

Budgettsundurgreining

tús. kr.	J	EYJ	J+EYJ
Útreiðslujáttan	47.374	-380	46.994
Inntøkujáttan	2.203	-	2.203
Útreiðslur	47.374	-380	46.994
Lønir	37.012	-	37.012
Annað	10.362	-380	9.982
Inntøkur	2.203	-	2.203
Aðrar inntøkur	1.846	-	1.846
Kommunupartur	389	-	389

19075 Røktarheim *(Rakstrarjáttan)*

Minniútreiðslur verða til rakstur av Sandoyar røktarheimi í 1. hálvári. Ætlanin er, at røktarheimið kann lata upp aftaná summarfríttíðina í ár. Hartil krevst at íløgan verður gjørd liðug, og skal hetta eisini síggjast í samband við uppskot til løgtingslóg um royndarskipan innan eldrarøkt í Sandoy, við atliti til skipan við røktarheimi í eindini heima á Sandi, og eldrasambýlum í eindunum í Skopun og Skálavík. Minniútreiðsla uppá kr. 1.200.000.

Budgettsundurgreining

tús. kr.	J	EYJ	J+EYJ
Útreiðslur	87.799	-1.200	86.599
Inntøkur	18.483	-250	18.233
Útreiðslur	87.799	-1.200	86.599
Lønir	70.716	-900	69.816
Annað	17.083	-300	16.783
Inntøkur	18.483	-250	18.233
Aðrar	317	-	317
Kommunupartur	18.076	250	17.826

Røktarheim *(Íløgujáttan)*

Vísandi til atfatina um eina royndarskipan um at taka eindina heima á Sandi í nýtslu sum røktarheim, og eindirnar í Skopun og í Skálavík sum eldrasambýlir, og samstundis taka avleiðingarnar av hesum í

kostnaðarbýtinum, soleiðis at luttakandi kommunur her skulu gjalda 10% av ítøgum til røktarheimspartin, verður talan um eina restløgu hjá landskassanum uppá kr. 650.000. Í hesum er eisini roknað við sparingum í samlaðu løgunni uppá kr. 1.840.000 til kr. 39.360.000. Meirútreiðsla uppá kr. 650.000.

Budgettsundurgreining

tús. kr.	J	EYJ	J+EYJ
Útreiðslujáttan	-	650	650
Útreiðslur	**-**	**650**	**650**

Lán til kommunurnar í Sandoymi

Í sambond við liðugtgerðina av røktarheiminum sum omanfyri tilskilað verður eisini ein eftirstøða hjá kommunum í Sandoymi at gjalda. Hetta eru ávísar kommunur í oymi ikki fyrr fyri. Talan verður, um skipanin sum omanfyri tilskilað fæst í lag, um eina mintu upphevdd, ið tó fyri ávísar kommunur kortini er tyngjandi. Fyri at løgan endaliga kann gerast liðug, og røktarheimið takast í nýtslu krevst sostatt, at landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veita upp til kr. 550.000 í láni, og at áseta nærri reglur fyri afturgjalding av lániunum. Meirútreiðsla uppá kr. 550.000.

Budgettsundurgreining

tús. kr.	J	EYJ	J+EYJ
Útreiðslujáttan	-	550	550
Útreiðslur	**-**	**550**	**550**

Sosialar pensiónir

19678 Viðbót til ávísar pensiónistar *(Lógarbundin játtan)*

Víst verður til bls. 11 í álitinum í løgtingsmáli nr. 9/1995 Løgtingsfíggjarlóg 1996. Meirútreiðsla uppá kr. 3.500.000. Meirilutin í fíggjarnevndini tók undir við uppskoti landsstýrisins um at hækka játtanina við 3,5 mió. kr. til 11,5 mió. kr., sum skilst hetdi av misgáum ikki meira, soleiðis at broytingin ikki slapp við í fíggjarlógina, har játtanin eftir hesum eigur at verða 11,5 mió. kr.

Budgettsundurgreining

tús. kr.	J	EYJ	J+EYJ
Útreiðslujáttan	8.000	3.500	11.500
Útreiðslur	**8.000**	**3.500**	**11.500**

§ 8 Heilsumál

A. Yvirlit

Játtanaryvirlit:

Túsund kr.	Nettotal	Útreiðslur	Inntøkur
Útreiðslujáttan	-	-	-

Felagsútreiðslur	**-145**	-
Heilsutænasta v.m.	**145**	-

B. Játtanir

			Útreiðslur	Inntøkur
Felagsútreiðslur				
12907/373305	Landsstýrinum at ráða yvir (rakstrarjáttan)	J	200	-
		EYJ	**-145**	-
Hellsutænasta				
12007	Sjúkrakassar	J	15.500	
		EYJ	**145**	-

Viðmerkingar

Felagsútreiðslur

12907/373305 Landsstýrinum at ráða yvir *(Rakstrarjáttan)*

Kr. 145 tús. verða fluttar til 12109 sjúkrakassar

Budgettsundurgreining

tús. kr.	J	EYJ	J+ EYJ
Útreiðslujáttan	200	-145	55
Útreiðslur	200	-145	55

Heilsutænasta

12109 Sjúkrakassar

Sjúkrakassarnir eru komnir við einari uppgerð, hvat kunngerðin um C- limagjaldið, sum ikki bleiv lýst at galda fyri árið 1993 og 1994, hevur kostað teimum.
Tá ið uppskotið til eykafíggjarlóg fyri 1995 bleiv gjørd, var Gjaldstovan ikki liðug við tað endaligu uppgerðina. Almanna- og heilsudeildin metti tá, við teimum upplýsingum tey høvdu, at upphæddin var 2,7 mió.kr. Søkt var tí um eina eykajáttan uppá 800.000 kr. í uppskotinum til eykafíggjarlóg fyri 1995.

Gjaldstovan er síðani komin við tí endaligu uppgerðini. Tað vísur seg nú, at upphæddin var størri, 2.9 mió. kr.

Málið hevur síðani verðið fyri landsstýrisfund tann 16. januar 1996, har landsstýrið samtykti, at latast skuldi endurgjald upp til 95,84% av útreiðslunum, soleiðis at endurgjaldið kundi avhaldast innan játtanina og eykajáttanina fyri 1995.

Men fyri at sjúkrakassarnir kunnu fáa fult endurgjald, má veitast ein eykajáttan uppá 145.000 kr.

Eykajáttanin viðfører ikki metrútreiðslur fyri landskassan, tí upphæddin verður flutt frá 12907/373305 Landsstýrinum at ráðu yvir.

Budgettsundurgreining

tús. kr.	J	EYJ	J+EYJ
Útreiðslujáttan	15.500	145	15.645
Útreiðslur	15.500	145	15.645

§ 10 Mentan

A. Yvirlit

Játtanaryvirlit:

Túsund kr.	Nettotal	Útreiðslur	Inntøkur
Útreiðslujáttan	192	192	-
Ítróttur	**192**	**-**	

B. Játtanir

Ítróttur			**Útreiðslur**	**Inntøkur**
15959/323713	Ítróttarsambandið	J	2.360	-
		EYJ	**192**	**-**

Viðmerkingar

Ítróttur

15959/323713 Ítróttarsambandið

Upphæddin svarar til tað upphædd, sum ÍSF hevur fingið frá Happadráttagrunninum.

Nýtslan av hesum rakstrarstað er tí treytað av, at løgtingið samtykkir lógaruppskot landsstýrisins um avtøku av landskassagrunnum

Budgettsundurgreining

tús. kr.	J	EYJ	J+EYJ
Útreiðslujáttan	-	192	192
Útreiðslur	-	192	192

§ 13 Fiski-, Ali- og Sjóvinna

A. Yvirlit

Játtanaryvirlit:

Túsund kr.	Nettotal	Útreiðslur	Inntøkur
Útreiðslur	-2.000	-2.000	
Íløgujáttan	9.200	9.200	

Tænasta og eftirlit.....	**7.200**	**-**

B. Játtanir

			Útreiðslur	Inntøkur
Tænasta og eftirlit				
	Vaktarskip *(Høgnjáttan)*		-	-
	(Nýtt rakstrarstað)	**EYJ**	**9.200**	**-**
[6301	Fiskiveiðueftirlit, Vaktar- og bjargingartænastan	J	21.402	2.500
		EYJ	**-2.000**	

Viðmerkingar

Tænasta og eftirlit

Vaktarskip *(Høgnjáttan)*

Tá vaktarskipið »Ólavur Halgi« var til árligt eftirlit í 1995 vóru óvæntaðar eykaútreiðslur vegna stórri umvælingar og at motorurin skuldi rættast av.
Síðani hevur klassin boðað frá, at skipið, sum er 36 ára gamalt, stendur fyri nógvum úskiftingum, sum verða at galda frá næsta sýni í august í ár. Hesir eykaútreiðslur hevur Vaktar- og bjargingartænastan gjørt upp til 3 mió. kr., sum koma at tyngja raksturin ov nógv fyri inniverandi fíggjarár.
Vaktar- og bjargingartænastan hevur tí arbeitt við at finna annað hóskandi skip, og hevur funnið eitt hóskandi skip, sum hoyrir til sjóverjuna í Frakklandi og sum hevur verið brukt sum kanningarskip og sum kann keypast fyri 6, 3 mió. kr. Aftrat hesum koma so útreiðslur til ymiskar umvælingar, soleiðis at skipið kann brúkast sum vaktarskip fyri Ólav Halga, sum so verður seldur.
Vaktar- og bjargingartænastan hevur gjørt hesa uppstilling:

Keypsprísur 1,1 mill dollarar		kr. 6.259
Krøv frá Søfartsstyrelsen		kr. 500
Dokseting, sýn, ferðing, eftirlit		kr. 400
Sandblásing, metallisering og máling		kr. 800
Broytingar, sum V & B krevur		kr. 1.200
	Ialt	kr. 9.159

Keypsprísur ialt kr. 9,2 mill.

Vísandi til, at 2 mió kr. kunnu brúkast á verandi fíggjaraetlan stovnsins, so verður talan um kr. 7,2 mill, sum biðið verður um eyka.
V & B metir tað ikki verða realistiskt at skera longur niður, tó fer V & B at royna at fáa keypsprísin niður á 1 mill. dollarar.

Budgettsundurgreining

tús. kr.	J	EYJ	J+EY
Útreiðslujáttan	-	9.200	9.200
Útreiðslur			

Viðmerkingar:
Dokksetan í samband við keyp er vanliga goldin av keypara, tí tað er hesin sum krevur dokksetingina og botnkanningina. Um nakað er at gera við skipið, verður hetta goldið av seljara.
Tað er helst ikki neyðugt at sandblása og metalliserða skipið, men hetta er ein góð viðgerð fyri skipið. Í Føroyum verður ikki sandblást á nakrari skipasmiðju, og verður tí rátt til at gera hetta har, sum skipið er,

og har umstøðurnar eru góðar til tess.
Brúgvavongurin í BB má innilokast og manøvrepultur gerast. Stb. vongur er innilokaður.
Skansaklædningur má gerast um bekkuna, har er bert gelendari.
Hydrauliskur kranl, sum er í BB, skal flytast í STB.
Stóra spælið á afturdekkinum má vendast 90°.
Tríggir gálgar verða tiknir burtur.
Neyðgeneratorur má setast upp. Hetta er krav frá Søfartsstyrelsen.
Bjargingarbátar skiftast út við danskt góðkendar.
Annars vanlig upppussing.

16301 Fiskiveiðueftirlit, Vaktar- og bjargingartænastan (Rakstrarjáttan)

Í sambandi við keyp av nýggjum vaktarskipi, verða 2 mío fluttar frá rakstrarjáttan til íløgujáttan.

Budgettsundurgreining

tús. kr.	J	EYJ	J+EYJ
Útreiðslujáttan	21.402	-2.000	19.402
Inntøkujáttan	2.500	-	2.500
Útreiðslur	21.402	-2.000	19.402
Lønir	14.712	-	14.712
Annað	6.690	-2.000	4.690
Inntøkur	2.500	-	2.500
Sjóvatrygging	2.000	-	2.000
Sleip v.m.	400	-	400
Søla av sjókortum v.m.	100	-	100

§ 16 Samferðsla og samskifti

A. Yvirlit

Játtanayvirlit:

Túsund kr.	Nettotal	Útreiðslur	Inntøkur
Útreiðslujáttan	1.880	1.880	-
Íløgujáttan	-1.500	-1.500	
Vegir og havnir	-	-	
Samferðsla	**380**	-	

B. Játtanir

Vegir og Havnir			**Útreiðslur**	**Inntøkur**
13037	Stoðningur til havnir	J	5.000	
		EYJ	**1.500**	
13018	Nýgerð av landsvegum	J	27.000	500
		EYJ	**-1.500**	-

Samferðsla

Serflutningsskipan **(Nýtt rakstrarstað)**	**EYJ**	**380**	**-**

Viðmerkingar

Vegir og Havnir

13037 Studningur til havnir

Játtanin í 1996, røkkur bara til gjørd havna- og lendingararbeiði, ferjulegur, umsiting og kanningar. Lendingin í Kirkju, bátahylurin í Svínoy, og bátahylurin í Skúoy standa í hálvum gekki. Eykajáttanin skal tí nýtast til hesi arbeiði.

Eykajáttanin viðførir ikki øktar útreiðslur fyri landskassan. Tí upphæddin verður flutt frá "Nýgerð av landsvegunum"

Budgettsundurgreining

tús. kr.	J	EYJ	J+EYJ
Útreiðslujáttan	5.400	1.500	6.900
Útreiðslur	5.400	1.500	6.900

13018 Nýgerð av landsvegunum *(Høgujáttan)*

Kr. 1.5 mió verða fluttar til 13037 Studningur til havnir

Budgettsundurgreining:

Túsund kr.	J	EYJ	J+EYJ
Útreiðslujáttan	27.000	-1.500	25.500
Inntøkujáttan	500	-	500
Útreiðslur	**27.000**	**-1.500**	**25.500**
Lánir	10.000	-	10.000
Annað	17.000	-1.500	15.500
Inntøkur	**500**	**-**	**500**
Tænastur og veitingar	500	-	500

Samferðsla

Serflutningsskipan

Á landsstýrisfundi tann 29. juli 1995 varð samtykt, at tann royndarskipan um serflutning fyri røslutarnað, sum hesi trý seinastu árini hevur verið í gildi í Tórshavn, ikki einans skal gerust til eina permanenta skipan, men skal eisini so við og við setast í gildi fyri alt landið.

Stýringsbólkurin fyri Serflutningsskipan Landsins hevur í hesum sambandi arbeitt við at kanna, hvussu Serflutningsskipanin kann setast í verk fyri alt landið, og hvussu kostnaðarbýtið kemur at verða. Stýringsbólkurin er komin fram til, at útfrá núverandi kostnaðarbýtinum, ið er: 45% landið, 45% kommununar og 10% brúkarin, so sær fíggingin soleiðis út:

- 1.050.000 kr. frá landinum
- 1.050.000 kr. frá kommununum
- 230.000 kr. frá brúkarunum
- 275.000 kr. frá umsorgararbeiði (ið verður goldið yvir Forsorgarlógina)

Almanna- og heilsudeildin hevði tann 18. desember 1995 fund við Stýringsbólkin. Á hesum fundi varð avtalað, at skipanin í hesum fíggjarári skuldi sum fyrsta stig koma at virka í Norðoyggjum. Í Norðoyggjum er tað soleiðis í dag, at har er ein bussur, sum hevur liftu og sum hevur koyrt við rørðslutarnaðum, men undir óskipaðum viðurskiftum.

Klaksvíkar kommuna gjørdi vart við hesi viðurskifti í skrivi tann 22. september 1995 har kommunan søkti landsstýrið um at fáa sett sonnu skipan í verk í Klaksvík sum ta ið Tórshavnar kommuna hevur.

Brúkarar, ið hava slíka skipan fyri neyðini í Klaksvík eru:

- Serskúlin
- Norðoyar Røktarheim
- Dáin
- Ellis- og Vistarheimið
- Verkstaðið á Brekku
- Klaksvíkar Sjúkrahús
- Eins og nógv heimabúgvandi rørðslutarnað til ymiski brúk.

Sambaert útrokningum hjá Stýringsbólkinum, so kemur landsins partur, av at seta eina permanenta skipan í verk í Tórshavn, at kosta 235.000 kr. og í Klaksvík at kosta 140.000,- kr.

Budgettsundurgreining

mió. kr.	J	EYJ	J+EYJ
Útreiðslujáttan	-	380	380
Útreiðslur	-	380	380

Almennar viðmerkingar

Sambaert nýggju stýrisskipanarlógini er meginreglan, at eykajáttanir verða veittar við løgtingslóg.

Landsstýrið ætlar tí at savna hesar umsóknir saman í felags lógaruppskot, sum verða løgd fyri tingið 2-4 ferðir árliga, alt eftir tørvi.

Uppskotið hevur sama snið sum broytingaruppskot til fíggjarlógaruppskotið.

Vanliga tá eykajáttanir verða veittar hava málini skund, og tí vil landsstýrið heita á løgtingið um skjóta viðgerð.

Sum meginregla, hevur landstýrið funnið sparingar svarandi til uppskot um eykajáttanir, soleiðis at lógaruppskotið á flestu økjum er útreiðsluneutralt.

Tó eru rakstrarstøð, har landsstýrið heldur, at tað ikki ber til at spara heilt í tann mun, sum eykajáttanin ljóðar uppá. Samlað økja hesar eykajáttanir um landskassans hall við kr. 11,527 mió. fyri fíggjarárið 1996. Raksturin økist við kr. 2,627 mió., fløgur við kr. 8,350 mió. og útlán við kr. 0,550 mió. Hallið á fíggjarlógini 1996 (RÍÚ) økist til kr. 179,946 mió. Íroknað eru útlán fyri kr. 30,450 mió. Sostatt verður rakstrar- og fløguhallið (RÍ) 1996 kr. 149,496 mió.

1. viðgerð 10. apríl 1996. Málið verð beint í fíggjarnevndina, sum 8. mai 1996 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum hin 25. mars 1996 og eftir 1. viðgerð 10. apríl 1996 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fleiri fundum og hevur í hesum sambandi innkallað landsstýrismenninar Jóannes Eidesgaard, Ivan Johannesen og Sámal Petur í Grund og umboð fyri fíggjar- og búskapardeildina, umboð fyri Toll- og skattstovu Føroya og umboð fyri Vaktar- og bjargingartænastuna.

Ivan Johannesen, landsstýrismaður og umboð fyri Vaktar- og bjargingartænastuna vóru á fundi í sambandi við viðgerðina av § 13 í uppskotinum, ið viðvíkur m.a. keypi av vaktarskipum. Tá ið vakturskipið Ólavur Halgi var til árligt eftirlit í 1995 vórðu óvæntaðar eykaútreiðslur vegna størri umvælingar og at motorurin skuldi rættast av. Skipið er nú 36 ára gamalt og stendur fyri nógvum úskiftingum, sum verða at galda frá næsta sýni í august í ár. Nevnt varð, at Ólavur Halgi verður dýrari og dýrari at viðlíkahalda og væntandi skulu uml. 2 mió. kr. brúkast til eykalutir til motorin innan eitt ár. Møguleiki er at keypa eitt skip, ið er 10 ára gamalt fyri uml. 9,2 mió. kr. Skipið, sum talan er um, er lítið brúkt og kann væntandi brúkast í eini 10-15 ár. Kostnaðurin av at byggja nýtt skip er mettur at verða uml. 70-80 mió. kr.

Á fundinum við Ivan Johannesen, landsstýrismann varð spurningurin um stuðul til keyp av frystum fiski eisini umrøddur. Í sambandi við viðgerðina av uppskotinum til fíggjarløgtingslóg fyri 1996, samdist ein meiriluti í fíggjarnevndini um at skerja játtanina til keyp av fiski úr 18 niður í 9 mió. kr. Sami meiriluti bant seg til at veita eykajáttan í fíggjarárinum til nevndu rakstrarstað, um tað seinni vil vísa seg, at tørvur er á meira peningi enn tí, sum játtað er á fíggjarlógini. Ivan Johannesen, landsstýrismaður segði, at tørvur enn ikki er á meira peningi, men hann roknaði við, at játtanin ikki fór at røkka.

Landsstýrismaðurin segði, at hann fer at taka spurningin upp aftur, nærstu ferð landsstýrið leggur uppskot um eykajáttanir fyri løgtingið. Í hesum máli vil fíggjarnevndin gera vart við, at hon framvegis stendur við ta tilsøgn, sum givin varð í álitinum til fíggjarlógina fyri 1996.

Undir § 6 almannamál er ein játtan til "Lán til kommununar í Sandoynni". Nevndin er av teirri áskoðan, at útlán úr landskassanum skulu vera við heimild í serligari játtatarlóg har m.a. reglur um rentur og aftur-gjald verða ásettar. Nevndin heldur, at landsstýrið eigur at leggja eina slíka lóg fyri løgtingið á ólavsøku. Nevndin tekur annars undir við at játta kommununum í Sandoynni hetta lán.

Viðv. § 16 "Samferðsla og sumskifti". Vegir og havnir verða í uppskotinum hekkaðar við 1,5 mió. kr. Peningurin skal nýtast til lendingina á Kirkju, bátahylin í Svínoy og bátahylin í Skúvoy, ið standa í hálvum gekki. Hóast játtanin var 5,4 mió. kr. á inniverandi fíggjarlóg og 90% av 900.000 vóru játtaðar til lendingina á Kirkju, so upplýsir landsverkfræðingurin, at øll játtanin er nýtt til fløgur, sum eru gjørdar í fjør, og har løgtingið áður hevur játtað stuðning. Tí verður neyðugt at hekka játtanina fyri 1996 um so er, at umanfyri nevndu arbeiðir skulu fremjast. Landsverkfræðingurin upplýsti eisini í nevndini, at stovnurin føler seg juridiskt bundnan at gjalda út pening, tá arbeiðini hava fingið játtaðan stuðning og arbeiðið er gjørt og góðkent av stovninum.

Hann mælti til, at taka aftur allar játtanir, ið ikki vóru framdar, tí annars koma meirútreiðslur av hesum slag eisini at sígggjast í framtíðar eykafíggjarlógum.

Meirjáttanin verður í uppskotinum tikin frá "Nýgerð av landsvegnum".

Tá játtanin er sundurgreinað í tey ymisku arbeiðini, er neyðugt at ásetta hvørt játtan skal skerjast tilsvarandi.

Uppá fyrispurning í fíggjarnevndini kundi landsverkfræðingurin ikki uppá standandi fót siga, hvaðan peningurin skuldi takast. Tá ið játtaða upphæddin ikki samsvarar við sundurgreiningarnar, er landsverkfræðingurin frítt stillaður at avgera hvat skal niðurprioriterast. Tí mugu hesar 1,5 mió. kr. arbeiðast inn í

sundurgreiningina fyri rakstrarstað 13018 "Nýgerð av landsvegum".
Tá so langt er útliðið í fíggjarárið og arbeiðir eru prosjekterað og fyrireikað, kann tað vera trupult at lækka eitt einstakt rakstrarstað. Tí verður skotið upp, at øll rakstrarstøðini í sundurgreiningini verða lækkað við 5,6% og verður tí sett fram

I broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

"Viðmerking til 13018 - Nýgerð av landsvegum.

Minnijáttanin verður at javna ímillum øll rakstrarstøðini við 5,6% av upprunajáttanini."

Eisini ger nevndin vart við, at heitið á løgtingsmálinum: "Løgtingslóg um eykajáttanir fyri fíggjarárið 1996" ikki er heilt rætt orðað, tá hugsað verður um, at landsstýrið møguliga kemur at leggja líknandi mál fram seinni í árinum og tí heldur nevndin, at heitið á málinum heldur eigur at verða: "Løgtingslóg um eykajáttanir í fíggjarárinum 1996" og setir fram

II broytingaruppskot

til

uppskot landsstýrisins

Heitið á løgtingsmálinum verður broytt til: "Løgtingslóg um eykajáttanir í fíggjarárinum 1996."

Annars tekur **ein samd nevnd** undir við uppskoti landsstýrisins.

2. viðgerð 10. mai 1996. Broytingaruppskot I samtykt við 19-2-0 atkvøðum. § 16 soleiðis broytt samtykt við 19-2-0 atkvøðum. Broytingaruppskot II samtykt við 20-1-0 atkvøðum. Heitið soleiðis broytt samtykt við 19-1-0 atkvøðum. Uppskot landsstýrisins uttan § 16 samtykt við 20-1-1 atkvøðum. Samtykt at beina málið til 3. viðgerð 22-0-0 atkvøðum.

3. viðgerð 15. mai 1996. Lógin sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 25-2-0 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 52, 20. mai 1996.

F.L. j.nr. 2500-18/96.

103 Løgtingslóg um royndarskipan innan eldrarøkt í Sandoynni

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Andrias Petersen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um royndarskipan innan eldrarøkt í Sandoynni.

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað at seta royndarskipan innan eldrarøkt í verk í Sandoynni. Endamálið við royndartiltakinum er at royna eina skipan, sum sameinir røktarheimsrakstur og heimarøkt.
stk. 2. Í royndartíðini lata luttakandi kommunur í oynni landsstýrinum eindirnar í Skálavík, heima á Sandi og Skopun ókeypis til nýtslu.
stk. 3. Royndartíðin er sett til 5½ ár, og er galdandi frá 1. juli 1996 og fer úr gildi 31. desember 2001.

§ 2. Royndartiltakið verður skipað soleiðis, at røktarheim verður heima á Sandi, meðan eindirnar í Skálavík og í Skopun verða nýttar til eldrasambýlir.
stk. 2. Royndartiltakið verður rikið sum landsstovnur, og fyriskipað undir Almannastovuni, sum hevur ábyrgdina av dagliga rakstrinum.

§ 3. Royndartiltakið inniber, at landsstýrinum verður heimilað at áseta reglur, sum kunnu víkja frá ásetingunum í § 3 í løgtingslóg nr. 125 frá 21. mai 1993 um býtið av almannaútreiðslum v.m. og §§ 27 og 28 í lógarkunngerð Almannamálaráðsins frá 2. mars 1988 um fólkapensjón við seinni broytingum.
stk. 2. Landsstýrið ásetir í kunngerð nærri reglur viðvíkjandi upptøku á stovni og sambýli, gjaldsreglur fyri búfólk, dagligu leiðsluna, fíggjarviðurskifti o.l.

§ 4. Kæra um upptøku, gjaldsviðurskifti og aðrar avgerðir hjá leiðsluni av royndarskipanini, ið viðvíkja stakpersónum, kunnu innan 4 vikur kærast til Kærunevndina í almannamálum, jb. § 6, stk. 3 í løgtingslóg nr. 47 frá 23. mars 1993 um kærunevnd í almannamálum.

§ 5. Útreiðslurnar til royndarskipanina verða í fíggjarárinum 1996 bildnar innan fyri játtanirnar til røktarheim og heimarøkt. Frá fíggjarárinum 1997 verður játtan at avseta á serligt rakstrarstað til royndarskipanina.

§ 6. Henda lóg fær gildi 1. juli 1996.

Alttennar viðmerkingar:

1. Inngangur

Í samband við samanleggingina av Heimahjálparskipanini og Heilsu- og heimasjúkrasystraskipanini til eina samskipaða Heimarøkt er grundsjónarmiðið, at í einari samskipaðari tænastu eru betri møguleikar at veita brúkaranum best gjørliga tænastu innan játtanarkarmin.

Játtanin vil so altíð verða ein avmarking av tænastustøðinum, veitt verður brúkaranum. Men eisini hvussu skipanin er innrættað, og sjálvandi hvussu væl hon verður rikin innan játtanarkarmin, vil verða avgerðandi fyri tænastustøðið. Tó má altíð vera galdandi at hava brúkaran í miðdepilinum, tá ið hugsað verður um, hvussu skipanir skulu verða innrættaðar.

Fyri at fáa best møguliga tænastustøðið innan givnar játtanarkarmar, tá ið hugsað verður um eldrarøkt í einum ávísum øki í landinum, er nærliggjandi at hugsa sær møguleikar fyri plássi á røktarheimi og í eldrasambýli, saman við heimarøktarvirkseminum undir eini og somu skipan. Afturat hesum kann hugsast møguleikin av, at seta dagrøkt á stovn fyri heimabúgvandi. Uppgávan hjá skipanini vil soleiðis verða til eina og hvørja tíð, at lúka tørvin fyri eldrarøkt best gjørligt innan játtanarkarmin.

Í Sandoynni hava tríggjar eindir síðani á vári 1993 staðið nærum klárar at taka í nýtslu, og himmegin er tørvurin innan eldrarøkt eisini í Sandoynni eyðsýndur.

Her eru sostatt góðir møguleikar at seta í verk eina royndarskipan við atliti til at fáa eftirkannað fyrimunir og fáa innvunnið royndir innihaldsliga eins væl og fíggjarliga, av eini tílíkari samskipaðari eldrarøkt í einum vælavmarkaðum øki sum í Sandoynni.

2. Galdandi lóggáva v.m.

Vanliga skipanin fyri bygging og rakstri av ellis- og røktarheimum.

Í § 32, stk. 1 í forsorgarlógini er landsstýrinum heimilað at seta á stovn og góðkenna m.a. ellis- og røktarheim. Eisini er landsstýrinum heimilað at áseta reglur viðvíkjandi rakstrinum, herundir um upptøku og gjaldsviðurskifti. Hesi viðurskifti hava vanliga verið nærri ásett í reglugerðini fyri ellis- og røktarheimið, sum síðani verður góðkend av landsstýrinum. (Ætlanin er tó í næstum í kunngerð at áseta reglur viðvíkjandi upptøkunevnd innan eldrarøktina).

Útreiðslurnar til byggingina av sjálvum ellis- og røktarheiminum (íløgan) vórðu sambært siðvenju rindaðar soleiðis, at landskassin veitti 90% av byggikostnaðinum í stuðli, og luttakandi kommunurnar útvegaðu sjálvar tey írestandi 10%. Stuðulin til íløguna varð rindaður úr Ansingar- og røktarheimsgrunninum, sum varð avtikin við løgtingslóg nr. 33 frá 27.03.1992 um avtøku av landskassagrunnum (§ 1, nr. 48).

Rakstrarútreiðslurnar verða býttar millum landskassan og kommunurnar samsvarandi reglunum í løgtingslóg nr. 125 frá 21.05.1993 um býti av almannaútreiðslum v.m. Í § 3 í hesi lóg framgongur, at útreiðslur til rakstur av røktar- og ellisheimum verða rindaðar soleiðis, at luttakandi kommunur rinda 15%, landskassin rindar 78,25% og síðani verða 6,75% býttar millum allar kommunurnar at rinda.

Í §§ 27 og 28 í fólkapensjónslógini eru ásettar reglur fyri gjaldi fyri stovnsuppihaldi í samband við at pensjónin dettur burt við stovnsuppihaldi. (Í uppskotinum til løgtingslóg um sosialar pensjónir o.a. er heimild givin til landsstýrinum í samband við royndarskipanir, at pensjónin kann útgjaldast í samband við uppihald á røktarheimi).

3. Lóggáva í londum rundan um okkum.

Í Danmark hava seinastu árini verið gjørd ymisk royndartiltøk innan almannaøkið, soleiðis at roynt hevur verið at skipa fyri tiltøkum tvørturum traditionellu mørkini. Nevnast kann t.d. royndarskipan viðvíkjandi barnaansing, sum kann ganga út uppá at samantvinna barnagarð, dagrøkt, frítíðarheim e.l. Eisini innan eldraøkið eru royndarskipanir gjørdar, t.d. at dagheimsvirksemið verður loyvt inni á ellisheimi.

Fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar.

4.1 Fíggjarligar avleiðingar.

Í samband við byggingina av røktar- og ellisheiminum í Sandoynni hevur landskassin rindað síni 90% av kostnaðinum í stuðli, men kommunurnar hava ikki enn rindað teirra fulla part uppá 10%. Hetta er lutvíst orsakað av fíggjarligu støðuni hjá kommununum, men orsøkin er lutvíst eisini aðrar ósemjur kommunanna millum.

Um røktar- og ellisheimið letur upp, so viðførir hetta sambært galdandi lóggávu, at kommunurnar hava lógarfestu skyldu til at rinda sín part av rakstrarútreiðslunum, tvs. 15% + part av 6,75%.

Uppskot til at fáa íløguna til røktarheimið heima á Sandi og eldrasamhýlini í Skálavík og í Skopun gjørdar lidnar er tikið við í lógaruppskoti til eykajáttan.

Kommunurnar part av rakstrarútreiðslunum hinumegin er ikki í sjálvum sær ein forðing fyri, at røktarheimið verður sett í rakstur, av tí at skattainntøkan hjá kommununum av lønarútgjaldingum í samband við røktarheimið í hvussu er, (lágt sett), vil verða á støði sum kommunalu rakstrarútreiðslurnar. Somuleiðis vil

verða galdandi undir skipan við, at kommununnar eisini gjalda parti av rakstrarútreiðslunum til eldrasambýlir, sum ætlanin er at fyriskipa undir royndarskipanini.

Ætlanin er at skipa fyri, at búfólkini sum flyta inn á røktarheimið eins og í eldrasambýlini, varveita pensjónina og gjalda eina ávísa upphædd fyri at búgva á heiminum, og verða harvið eisini rakstrarútreiðslurnar tað minni.

Í fíggjarárinum 1996 verða útreiðslurnar til royndarskipanina bildnar innanfyri játtanirnar til røktarheim og heimarøkt, og verður hetta fyrsta hálva árið at rokna sum eitt fyrireikingar tíðarskeið til eina 5 ára royndartíð.

Skipað verður fyri, at játtan til royndarskipanina frá fíggjarárinum 1997 verður avsett á serligt rakstrarstað á fíggjarlógina, soleiðis at møguleikar verða fyri neyvt at stýra útreiðslustøðið í sínu heild, og at innvinna sær tær royndir ið ætlanin er at fáa av eini tílíkari samskipaðari eldrarøkt í Sandoynni, innihaldsliga eins væl og fíggjarliga.

Umsitingarligar avleiðingar.

Tiltøkini innan eldrarøktina í Sandoynni, røktarheim, eldrasambýlir og heimarøktarvirksemi úti í heiminum, verður skipað í eitt økið undir einum leiðara, sum hevur dagligu ábyrgdina av rakstrinum av eldrarøktini í oynni. Royndartiltakið verður sostatt landsstovnur fyriskipaður undir Almannastovuni.

Viðmerkingar frá umanælandi stovnum.

Í sambandi við arbeiðið at finna eina loysn viðvíkjandi eindunum á Sandoynni bygdar til ellis- og røktarheim, hevur síðani 1993 verið eitt orðaskifti um uppskot til alternativan rakstur av eldrarøktini í Sandoynni millum landsstýrið, Almannastovuna og kommununnar í oynni. Breið semja hevur verið um, at skipa fyri møguleikanum fyri einari tílíkari skipan sum innihildið í uppskotinum til royndarskipan.

Fyritreyt er at kommununnar í Sandoy taka undir við royndarskipanini, og vil Almanna- og heilsudeildin aftaná framløguna av uppskotinum skipa fyri at fáa formligar viðurskiftini í lag við luttakandi kommunur.

Viðmerkingar til einstøku greinirnar.

Til § 1.
Landsstýrið fær heimild til, at seta í verk og fyriskipa royndarskipan innan eldrarøkt í Sandoy galdandi fyri eitt tíðarskeið uppá 5½ ár.

Luttakandi kommunur í oynni nugu, um royndarskipanin skal gerast verulig, lata landsstýrinum nýbygdu eindirnar til endamálið, við athuga til at samskipa røktarheimsrakstur og heimarøkt (heimahjálp og heimasjúkrarøkt).

Til § 2.
Fyriskipað verður soleiðis, at í eindunum heima á Sandi verða røktarheimspláss, og eindirnar í Skálavík og í Skopun verða nýttar til eldrasambýlir.

Stovnin eins væl og eldrasambýlini og heimarøktin verða tilsamans undir royndarskipan rikin sum landsstovnur.

Til § 3.
Landsstýrið fær heimild til at gera frávik í lógarásetingunum í løgtingslóg um býtið av almannaútreiðslum og í fólkapensiónslógini. Ætlanin er at kommununnar eins og viðvíkjandi rakstrarútreiðslum til røktarheimið, somuleiðis skulu gjalda partar av av rakstrarútreiðslunum til eldrasambýlir. Somuleiðis er ætlanin innan royndarskipanina, at pensjónin kann útgjaldast eisini í sambandi við uppihaldi í røktarheimi.

Landsstýrið fær heimild til í kunngerð at áseta nærri reglur viðvíkjandi upptøku á stovni og í sambýli, gjaldsreglur fyri búfólk, dagligu leiðslunna, fíggjarviðurskifti o.l.

Til § 5.
Víst verður til viðvíkjandi fíggjarliga avleiðingarnar undir Almennum viðmerkingum.

1. viðgerð 17. apríl 1996. Málið varð beint í trivnaðarnevndina, sum 2. mai 1996 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 25. mars 1996 og eftir 1. viðgerð 17. apríl 1996 beint í trivnaðarnevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini av málinum havt fund við Andreas Petersen, landsstýrismann, og hevur býti seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Kristian Magnussen, Maria Hansen, Lisbeth L. Petersen og Jákup Olsen) mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Jørgen Niclasen og Óli Breckmann) førir fram, at nú eru 20 ár liðin, síðan Fólkaflokkurin byrjaði at tala fyri einum samskipaðum eldrapolitikki við ellis- og røktarheimseindum, sum hóska til føroysk viðurskifti og fíggjarorku. Fólkafloksins atfinningar í móti tí dýru donsku fyrimyndini vórðu tá kveistraðar til viks av teim vinstrahallu sum ein "trælanípuloysn", hóast vit vístu á góð, bílig norsk og íslendsk fyridømi, sum vit kundu fylgt. Men danskt íblásti tíðarandin tá kravdi, at hvørt føroyskt stovnspáss kostaði sum tvey sethús at byggja umframt rakstur.

Fólkaflokkurin loyvdi sær at ivast í, hvat teir ráðandi raðfestu bægri, almennar starvsáhugar ella gagn teirra eldru. Men í dag umsíður noyðast teir sosialistisku flokkarnir at boyggja seg fyri, at øll fíggjarorkan til eldrarøkt varð brúkt til nøkur fá gomul, so einki varð eftir til fjøldina. Betri seint enn onguntíð. Av tí at hetta uppskot landsstýrisins til royndarskipan við entegreraðum eldrapolitikki á Sandoy er ein sigur, um enn 20 ár ov seint, fyri grundsjónarmið Fólkafloksins, mælir minnilutin til at taka undir við uppskotinum.

2. viðgerð 8. mai 1996. Samtykt við 25-0-0 atkvøðum at beina málið til 3. viðgerð.

3. viðgerð 14. mai 1996. Málið endaliga samtykt við 28-1-0 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 63, 20. mai 1996.

F.L. j.nr. 1027-4/92.

104 Løgtingslóg um Sjúkrahúsverk Føroya.

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Andrias Petersen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um Sjúkrahúsverk Føroya.

Kapittul 1.

Almennar reglur

§ 1. Henda lóg um Sjúkrahúsverk Føroya er givin út sambært "Lov nr. 316 af 17. maj 1995 om sundhedsvæsenet på Færøerne".

§ 2. Sjúkrahúsverkið fevnir um 3 sjúkrahús og Deildina fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu. Til sjúkrahúsverkið hoyra eisini serligir stovnar.
Stk.2. Sjúkrahúsini eru Landssjúkrahúsið, Klaksvíkar sjúkrahús og Suðuroyar sjúkrahús.
Stk.3. Landsstýrið ásetir nærri reglur um, hvørjir serligir stovnar hoyra undir sjúkrahúsverkið og teirra virki.

§ 3. Landsstýrið ásetir nærri reglur um bygnaðin og fyrisitingarlig viðurskifti fyri Sjúkrahúsverk Føroya.

§ 4. Heilsustýrið hevur eftirlit við sjúkrahúsverkinum.

Kapittul 2.

Læknavirksemi á sjúkrahúsunum

§ 5. Yvirlæknarnir á sjúkrahúsunum hava rætt og skyldu at veita hjálp og móttaka hjálp frá hinum sjúkrahúsunum og rætt til at senda sjúklingar til viðgerðar í Danmark.
Stk.2. Í serligum føri kann ein yvirlækni, við loyvi frá leiðsluni fyri sjúkrahúsverkið, senda sjúklingar til viðgerðar í øðrum londum.
Stk.3. Nærri reglur viðvíkjandi stk. 1 og 2 verða ásettar av landsstýrinum.
Stk.4. Við øll sjúkrahúsini kunnu setast á stovn sergreinir í tann mun, serkønir læknar eru á staðnum, eftir tilráðing frá leiðsluni á sjúkrahúsverkinum.

Kapittul 3.

Rættin til veitingar

§ 6. Viðgerð í sjúkrahúsverkinum er ókeypis fyri persónar við bústaði í Føroyum, sbr.tó stk.2.
Stk.2. Persónar, sum flyta til Føroyar úr Danmark ella Grønlandi, hava rætt til tað í stk.1 umrøddu ókeypis viðgerð. Persónar, sum flyta til Føroyar úr útlandinum, hava ikki rætt til hesar veitingar fyrr enn 6 vikur eftir at teir eru fluttir. Landsstýrið kann áseta reglur um, at nærri ávísir persónbólkar fáa rætt til ta í stk.1. umrøddu veiting beinanvegin eftir at teir eru fluttir ella eftir eitt uppihald, sum er styttri enn 6 vikur.
Stk.3. Persónar, við bústaði í Danmark ella Grønlandi, sum fyribils halda til í Føroyum, hava rætt til ta í stk.1 umrøddu ókeypis viðgerð beinanvegin, um ikki endamálið við uppihaldinum var at fáa sjúkrahúsviðgerð, og sjúklingurin ikki kann flytast til eitt sjúkrahús har persónurin hevur búðstað, ella annars hevur tørv á bráðfeingis hjálp. Landsstýrið kann áseta reglur um, at givin verður persónum við bústaði í útlondum, sum fyribils halda til í Føroyum, ókeypis viðgerð á teimum føroysku sjúkrahúsunum og hartil hoyrandi stovnum.
Stk.4. Tá teir í stk. 1-2 nevndu persónar við játtan frá sjúkrahúsverkinum fáa viðgerð í Danmark ella í einum øðrum landi, verða tær útreiðslur sum standast av viðgerðini goldnar av sjúkrahúsverkinum.
Stk.5. Tá ið serlig viðurskifti gera seg galdandi, kann landsstýrið áseta reglur um, at summar viðgerðir verða veittar ókeypis uttan mun til, hvar sjúklingurin býr.
Stk.6. Uttan mun til reglurnar í stykki 1-5 kann landsstýrið áseta reglur um, at í serligum føri kann gjald áleggjast fyri ávísar viðgerðir og veitingar ella fyri viðgerð á ávísum stovnum.
Stk.7. Fyri persónar, sum sambært hesi lóg ikki hava rætt til ókeypis viðgerð, verða reglur viðvíkjandi gjaldi ásettar av landsstýrinum.

§ 7. Til persónar, sum sambært § 6 hava rætt til ókeypis viðgerð, verður veittur flutningur ella givið

ferðaendurgjald í Føroyum, um støðan hevur viðført, at flutningur er neyðugur.
Stk.2. Landsstýrið ásetur nærri reglur um flutning ella ferðaendurgjald til sjúklingar, sum við samtykt frá sjúkrahúsverkinum skulu fara úr Føroyum til viðgerðar í einum øðrum landi.
Stk.3. Viðvíkjandi rindan av øðrum útreiðslum í samband við at sjúklingur, sum við samtykt frá sjúkrahúsverkinum, skal sendast úr Føroyum til viðgerðar í einum øðrum landi, ásetir landsstýrið nærri reglur.
Stk.4. Landsstýrið ásetur nærri reglur um, í hvørjum øðrum førum flutningur ella ferðaendurgjald verður givið.

§ 8. Ferðin, har endurgjald eftir § 7 verður givið, skal verða gjørd við tí eftir umstøðunum bíligasta og ráðligasta flutningshátti. Landsstýrið kann áseta mark fyri ferðaútreiðslurnar.
Stk.2. Nærri reglur, um veitan av flutningi og ferðaendurgjaldi og rindan av øðrum neyðugum ferðaútreiðslum í samband við hetta, verða ásettar av landsstýrinum.

§ 9. Útgjaldan av ferðaendurgjaldi og loysn av øðrum flutningsuppgávum í Føroyum verður umsitin av tí sjúkrahúsi, har sjúklingurin fær viðgerð.

Kapittul 4.

Kærurætturr

§ 10. Avgerðir, tiknar av leiðslumi fyri sjúkrahúsverkið, um rætt til viðgerð, flutning ella ferðaendurgjald, kunnu kærast til landsstýrið.
Stk.2. Kærast skal innan 4 vikur eftir at kæraran hevur fingið fráboðan um avgerðina.
Stk.3. Landsstýrið kann síggja burtur frá kærufreistini, tá ið serlig viðurskifti gera seg galdandi.

§ 11. Landsstýrið kann áseta, at heimildin hjá landsstýrinum eftir § 10 kann leggjast til eina kærunevnd.

Kapittul 5.

Gildissetan o.a.

§ 12. Henda lóg fær gildi 29. juli 1996.
Stk.2. Samstundis fara úr gildi ásetingarnar í lógarkunngerð nr. 137 frá 6.mars 1991 "for Færøerne om sygehusvæsenet" við seinni broyting, tó ikki §§ 17-19.

VIÐMERKINGAR TIL LÓGARUPPSKOTIÐ

I. ALMENNAR VIÐMERKINGAR

1. INNGANGUR

Sambært "Lov nr. 137 af 23. marts 1948 om Færøernes hjemmestyre" er sjúkrahúsverkið felagsmál. Sambært § 9 í hesi lóg kunnu, eftir samráðing, gerast avtalur um, í hvørjum føri og í hvørjum mun tað er møguligt innan fyri øki, sum eru felagsmál, at geva heimastýrinum heimild til, at áseta nærri reglur viðvíkjandi serligum føroyskum viðurskiftum og yvirtaka umsitingina á hesum øki.

Eftir umbøn frá landsstýrinum, varð ein ráðgevingarbólkur niðursettur, sum varð samansettur av fólki frá danska og føroysku heilsumyndileikunum.

Ráðgevingarbólkurin kom við tilmæli um, at gera eina rammulóg fyri heilsuøki.

"Lov nr. 316 af 17. maj 1995 om sundhedsvæsenet på Færøerne" -rammulógin- heimilar heimastýrinum at gera løgtingslógir innan heilsuøkið, og soleiðis viðvíkjandi uppgávum, veitingum og umsiting tess av Sjúkrahúsverk Føroya.

Endamálið við rammulógini er, at geva heimastýrinum møguleikar at betra samskipanina av veitingum frá heilsuverkinum og umsiting tess, og at laga heilsuverkið eftir teimum serligu føroysku viðurskiftunum.

Rammulógin hevur við sær, at so hvørt sum heimastýrið útfyllir rammulógina, hevur landsstýrið eisini ta ábyrgd, sum áður lá hjá Heilsumálaráðnum. Hetta er at hava eftirlit við teimum reglum, sum løgtingið ásetur, bæði innihaldsliga og viðvíkjandi umsitingini av teimum.

Til nýggjar løgtingslógir eru settar í gildi, verða tær dansku fólkatingslógirnar verandi í gildi. Avtala er gjørd millum landsstýrið og dansku stjórnina um arbeiðsætlan fyri lógararbeiðið, sum sigur, at rammulógin skal vera útfylt í 1997. Tvs., at løgtingslógir tá eru samtyktar á øllum heilsuøkinum (sí pkt. 5 í felagsyvirlýsingini frá fundinum millum landsstýrið og stjórnina 3. nov. 1995 og ætlan um útfyllandi lóggávu fyri almanna- og heilsuøki, her endorgivið úr uppskotinum til lóg um tilskot til Føroya heimastýrið fyri árini 1996-98, sí fylgiskjal 1).

2. GALDANDI LÓGGÁVA

Tær núgaldandi reglur viðvíkjandi sjúkrahúsverkinum í Føroyum finnast í "Lov nr. 621 af 22. december 1976" jvf. "Lovbekendtgørelse nr. 137 af 6. mars 1991" við seinni broytingum.

Sambært § 1 í løgtingslóg nr. 103 frá 26. juli 1994 um stýrisskipan Føroya, skal tað útinnandi valdi verða hjá landsstýrinum. Farast skal frá einum kollegialum stýri til eitt ráðharrastýri sambært § 33 í sama lóg. Við ráðharrastýri hevur hvør landsstýrismaður tað politisku og rættarliga ábyrgdina av sínum málsøki og allari fyrisitingini á økinum. Hvør landsstýrismaður skal sjálvur taka allar avgerðir á síhum málsøki, og við hesum verður ábyrgdarfestingin greiðari og politiska støðutakanin einfaldari.

Tí verður neyðugt at broyta bygnaðin innan sjúkrahúsverkið. Eftir galdandi lóggávu verða sjúkrahús stýrd av einum sjúkrahússtýri. Sjúkrahússtýrini standa fyri rakstrinum á sjúkrahúsinum og taka endaligar fyrisitingarligar avgerðir. Henda heimild verður flutt sambært stýrisskipanarlógini til landsstýrismannin fyri hesum málsøki.

3. LÓGGÁVAN Í LONDUM RUNDAN UM OKKUM

Tann danska sjúkrahúslógin, sum er frá 1974 við seinni broytingum, er í sínum innihaldi lík fyriliggjandi lógaruppskoti. Tó kemur munurin millum føroysku og dansku skipanina til sjóndar, tá talan er um bygnaðin. Sjúkrahúsøkini eru býtt upp eftir amtum. Fleiri størri og smærri sjúkrahús eru innan fyri hvørt amt og hesi sjúkrahús kunnu veita tær allar flestu viðgerðir.

Í 1990 legði tann tásitandi danski heilsumálaráðharrin fram uppskot til lov um almenna heilsuverki. Hetta lógaruppskotið fevndi um alt heilsuverkið og ikki bert sjúkrahús. Uppskotið fall í fólkatinginum.

Í Grønlandi bleiv lóg um heilsuverkið samtykt í 1991. Henda lóg umfatar alt heilsuverkið og er tí meira víttfevnandi enn fyriliggjandi uppskot í Føroyum.

4. FÍGGJARLIGAR OG UMSITINGARLIGAR AVLEIÐINGAR

Fíggjarligu avleiðingarnar av, at møguleiki er fyri at senda avvarandi v.f. við sjúklingum til viðgerðar til eitt annað land, er torført at meta um. Tað kann nevnast, at í dag eru ferðaútreiðslur í samband við viðgerð uttanlands umleið 5 mill. kr.

Við fyriliggjandi uppskoti er møguleiki fyri, at føroyskir sjúklingar verða viðgjørdir aðrastaðni enn í Danmark og skuldi hetta, alt annað líka, givið størri ferðaútreiðslur. Væntast má tó, at grundgevingin fyri, at sjúklingar verða viðgjørdir aðrastaðni enn í Danmark, er m.a. av fíggjarávum og tá vilja ferðaútreiðslurnar innganga, so alt annað líka, átti hetta ikki at havt øktar útreiðslur við sær.

5. VIÐMERKINGAR FRÁ UMMÆLANDI STOVNUM, FELØGUM OG RÁÐUM

Landslæknin, sjúkrahússtjórin og sjúkrahússtýrini hava havt lógaruppskotið til ummælis.

Landslæknin hevði eina viðmerking til lógaruppskotið. Henda var, at í grein 6, stk. 3, 3. regla verður sett inn aftanfyri eitt sjúkrahús, "ella annan viðgerðarstovn".

Ístaðin fyri at skriva "sjúkrahús ella annan viðgerðarstovn" stendur í uppskotinum, "til viðgerðar í einum øðrum landi". Í serligum førum verða sjúklingar sendir aðra staðni enn til eitt sjúkrahús, sum t.d. til uppvenjingar í Hornbæk. Lógin skal ikki verða ein forðing fyri, at sjúklingar fáa tað neyðugu viðgerðina.

Sjúkrahússtjórin hevur fleiri viðmerkingar til lógaruppskotið. Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu er ein partur av sjúkrahúsverkinum. Deildin hoyrir ikki undir eitt av sjúkrahúsunum og tann yvirlæknin, ið er settur har, er settur við Sjúkrahúsverk Føroya. Henda viðmerking er komin í uppskotið, og er henda deild nevnd í uppskotinum, sum ein partur av sjúkrahúsverkinum, á jøvnum føti við sjúkrahúsini.

Somuleiðis ynskir sjúkrahússtjórin og Læknaráðið á Landssjúkrahúsinum, at § 5 í verandi sjúkrahúslóg verður sett í uppskotið. Henda ásetingin sigur, at yvirlæknarnir á sjúkrahúsinum hava rætt og skyldu til at arbeiða saman og rætt til at senda sjúklingar til viðgerðar á sjúkrahús í Danmark. Hetta verður sett í uppskotið, men ikki í sama líki sum fyrr. Meiningin var ikki at taka rættin frá yvirlæknunum at senda sjúklingar til viðgerðir uttanlanda, men ætlanin var, at hava hetta í reglugerðini fyri Sjúkrahúsverk Føroya ístaðin.

Sjúkrahússtjórin og Læknaráðið á Landssjúkrahúsinum meina, at ikki er rætt, at gjalda heimferð fyri deyðar persónar. Hetta førur við sær, at sjúkrakassarnir sleppa undan at gjalda tað upphædd, sum teir gjalda í dag, og at viðgerðin sum sambært lógini er ókeypis fyri persónar búsitandi í Føroyum, bert er ókeypis fyri livandi persónar og ikki deyðar persónar.
Henda viðmerking er ikki gingin teimum á møti. Nærri um "jarðarferðarhjálp" undir viðmerkingunum til tær einstøku greinirnar.

Viðmerkingarnar frá Landslæknanum, sjúkrahússtjóranum og sjúkrahússtýrinum er lagt við sum fylgiskjøl.

II. VIÐMERKINGAR TIL EINSTØKU GREINIRNAR

Kapittul 1

Til § 2

Sjúkrahúsverkið ger kanningar og gevur viðgerð og røkt til persónar sum búgva í Føroyum og aðrar persónar sum er nærri ásett í § 6 og sum hava tørv á sjúkrahúsviðgerð. Viðgerð av sjúklingum, sendir til Danmarkar ella onnur lond, er eisini virkisøki hjá Sjúkrahúsverk Føroya.

Landssjúkrahúsið er at rokna sum sentralsjúkrahús fyri Føroyar. Tann stovnur sum hoyrir undir sjúkrahúsverkið í dag er Hotel Tórshavn. Teir stovnar sum í framtíðini kunnu koma at hoyra undir sjúkrahúsverkið eru t.d. stovnar fyri rúsevnisnýtarar og stovnar til eftirbatarekreatión). Landsstýrið fer at áseta nærri reglur fyri hesar stovnar.

Til § 3

Eftir tí galdandi sjúkrahúslógini verða tey 3 sjúkrahúsini stýrd av einum sjúkrahússtýri, eitt fyri hvørt sjúkrahús. Uppgávan hjá sjúkrahússtýrunum er at standa fyri rukstrinum av sjúkrahúsunum. Tann dagliga fyrisitingarliga leiðslan av sjúkrahúsverkinum verður røkt av einum stjóra, sum verður tilnevndur av Føroya Landsstýri.

Í samband við ráðharrastýrið, sum kemur í gildi sambært stýrisskipanarlógina á Ólavsøku 1996, hevur landsstýrið sett fólk til at koma við uppskoti til bygnaðarbroytingar innan almenna sektorin.

Tá bygnaðarbroytingar eru gjøgnumførdar, kann landsstýrið áseta nærri reglur um bygnaðin og tey fyrisitingarligu viðurskiftini innan fyri Sjúkrahúsverk Føroya.

Til § 4

Sambært "Anordning nr. 633 af 20. juli 1995 om ikrafttraeden på Faeroerne af lov om embedslægeinstitutioner m.v." setir Heilsumálaráðið á stovn ein embætislæknastovn í Føroym. Embætislæknin í Føroyum eitur: Landslæknin í Føroyum.

Sambært hesi fyriskipan hevur landslæknin sonu uppgávu sum hipartil.

Heimastýrið yuskti ikki at yvirtaka tí heilsufukligu ábyrgdina á heilsuøkinum. Uppgávan hjá landslæknanum er generelt, Heilsustýrisins vegna, at fylgja heilsuviðurskiftunum í Føroyum, ansa eftir at heilsulóggávan verður hildin og gera landsstýrið og ríkismyndileikarnar varugar við manglar við teimum heilsuligu tiltøkunum og koma við uppskotum um ábøtur.

Kapittul 2

Tað er bert yvirlæknarnir í sjúkrahúsverkinum sum hava ávísingarrætt til at senda sjúklingar til viðgerðar uttanlands. Tað er yvirlæknin innan fyri tað ávísu sergreinina, sum skal hava ávísingarrættin. Bert í teimum førum ongin serlækni er, er ávísingarrætturin hjá einum øðrum yvirlækna.

Kapittul 3

Hesar reglur vísa á, hvørjir persónar hava rætt til fría viðgerð og flutning ella ferðaendurgjald frá sjúkrahúsverkinum. Tey geografisku viðurskiftini í Føroyum eru soleiðis, at neyðugt er at veita flutning ella ferðaendurgjald til sjúklingar.

Til § 6

Ad stk.3. Hendu ásetingin er broytt í mun til tað núgaldandi sjúkrahúslóg. Eftir tí galdandi sjúkrahúslóg kann landsstýrið áseta nærri reglur fyri persónar, við bústaði í Danmark ella Grønlandi, sum fyribils halda til í Føroyum. Rammulógini fyri heilsuøki ásetur, at hesir persónar hava rætt til fría viðgerð við tað samanum ikki endamálið við uppihaldinum var at fáa sjúkrahúsviðgerð, og sjúklingurin ikki klárar at blíva fluttur til eitt sjúkrahús í búðstaðaramtinum, ella annars hevur tørv á hráðfeingis hjálp.

Ad stk.4. Neyðugt er í ávísum førum at senda sjúklingar frá Føroyum til eitt annað land fyri at fáa viðgerð. Higartil hava vit aloftast sent sjúklingar til Ríkissjúkrahúsið í Danmark. Sjúkrahúsverk Føroya hevur upparbeitt eitt gott samstarv við Ríkissjúkrahúsið gjøgnum árini. Sambært hesum uppskotinum verður møguleiki fyri, at sjúkrahúsverkið kann senda sjúklingar til onnur lond enn Danmark. Mett hevur verið, at í serligum førum kann tað verða ein fyrimunur, at kunna senda sjúklingar til onnur lond.

Ad stk.6. Í serligum føri kunnu ásetast avmarkingar fyri, hvat fyri viðgerðir sjúkrahúsini skulu gjalda fyri. Í serligum føri kann sjúklingurin gjalda sjálvur ella ein annar stovnur uttan fyri sjúkrahúsi.

Tá landsstýrið ler at áseta nærri reglur um, hvørjir stovnar hoyra undir sjúkrahúsverkið, er tað ein møguleiki fyri, at áleggja gjald fyri ávísar viðgerðir og veitingar.

Ad stk.7. Sambært hesum stykki, er tað ein møguleiki fyri, at persónar sum ikki hava rætt til fría viðgerð eftir hesi lóg, t.d. útlendskir turistar, sum yuskja viðgerð, sum ikki er hráðneyðug, ella persónar, sum eru komnir til Føroyar bert fyri at fáa viðgerð á Sjúkrahúsverk Føroya, kunnu fáa viðgerð frá sjúkrahúsverkinum móti gjaldi. Landsstýrið kann áseta nærri reglur hesum viðvíkjandi.

Til § 7

Ad stk.1. Sjúkrahúsverkið er heimilað at veita flutnings- og ferðaendurgjald til persónar, ið hava rætt til fríar veitingar sambært hesi lóg.

Flutnings- ella ferðaendurgjald verður veitt í samband við flutning millum bústað ella uppihaldsstað og viðgerðarstaðið.Flutningur við sjúkrahili ella øðrum flutningsfari verður veittur persónum, har stoðan ger flutning neyðugan. Val av flutningshátti skal gerast í samráð við sjúkrahúsverkið.

Ad stk.3. Núgaldandi sjúkrahúslóg heimilar bert sjúkrahúsverkinum at gjalda flutning fyri tann persónin sum hevur rætt til viðgerð eftir hesi lóg. Tørvur hevur verið á, at eisini aðrar útreiðslur kunnu gjaldast av sjúkrahúsverkinum og eisini hevur verið tørvur á, at sjúkrahúslógin heimilar, at gjalda fyri aðrar persónar enn sjúklingin sjálvan.

Sendir sjúkrahúsverkið sjúkling til viðgerðar til Danmarkar ella til eitt annað land, skal sjúkrahúsverðið gjalda flutning báðar vegir. Hetta verður eisini galdandi um sjúklingurin doyr, meðan hann er til viðgerð uttanlanda.

Tað sum er galdandi í dag er, at sjúkrakassin ber kostnaðin fyri ein part av flutninginum, men tey avvarðandi skulu leggja peningin út og taka sær av øllum tí praktiska. Í uppskotinum er hetta broytt, so at sjúkrahúsverkið tekur sær av øllum tí praktiska og eisini ber allan kostnaðin. Tala er ikki um so stóra upphædd um árið.

Møguleiki skal eisini verða fyri, at sjúkrahúsverkið kann senda avvarðandi avstað aftanæ at sjúklingurin er sendur avstað. Hetta er t.d. í teimum førum har ongin avvarðandi fór við sjúklinginum, støðan hjá sjúklinginum broytist eftirfylgjandi og í teimum førum har sjúklingurin fær viðgerð í eitt longri tíðarskeið. Her hevur vist seg ein tørvur, m.a. tá annað av foreldrunum er farið uttanlanda við einum sjúkum barnið og viðurskiftið í familjuni o.a. gera, at neyðugt er hjá foreldrunum at skiftast at verða saman við tí sjúka barninum.

Kapittul 4

Til § 10

Einasta broyting til galdandi sjúkrahúslóg er, at avgerðirnar sum kærast kann um, nú verða tiknar av leiðsluni fyri sjúkrahúsverkið og ikki av sjúkrahússtýrinum.

Til § 11

Galdandi lóggáva gevur bert heimild til at kæra avgerðir tiknar av sjúkrahústýrinum til landsstýri. Tá bygnaðarbroytingarnar eru framdar, kann støða takast til í hvønn mun og á hvønn hátt viðgerð av kærum skal skipast. Lógaruppskotið gevur landsstýrinum møguleika til at leggja sínar heimildir til eina kærunevnd.

Kapittul 5

Til § 12

Ásetingin heldur fram við teimum galdandi treytum fyri tey starvsfólk, sum vórðir tænasturmenn og sum við ársendað 1976 vóru í starvi við "statshospitalet í Tórshavn".

1. viðgerð 12. april 1996. Málið varð beint í trivnaðarnevndina, sum 8. mai 1996 legði fram soljóðandi

Á 1 1 1

Málið er lagt fram av landsstýrinum 25. mars 1996 og eftir 1. viðgerð 12. april 1996 beint í trivnaðarnevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini havt fund við Andreas Petersen, landsstýrismann, og umboð fyri tey 3 sjúkrahústýrini umfram umsjónarmenninar við sjúkrahúsini.

Nevndin átalaði yvir fyri landsstýrismanninum, at hetta stórmál kom so seint til løgtingið, soleiðis at løgtingið hevur ikki stundir at viðgera málið til lýtur.

Upp á fyrispurning, hví Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu í uppskotinum er sett sum ein partur av sjúkrahúsverkinum á jøvnum føti við sjúkrahúsini, svaraði landsstýrismaðurin, at deildin higartil ikki hevur verið undir nøkrum sjúkrahúsi, og at hon tí er nevnd sum deild.

Upp á fyrispurning um í hvønn mun, ið til ber at varðveita tey 3 sjúkrahússtýrini og hvussu, ið landsstýrismaðurin kundi hugsað sær tetra leiklut í einum framtíðar sjúkrahúsverki, svaraði landsstýrismaðurin, at hann kundi hugsað sær stýrini sum ráðgevandi hjá landsstýrinum, tó uttan at besi hava fyrisitingarligar heimildir.

Í galdandi sjúkrahúslóg er ásett í § 5, stk. 2, at "Ved hvert sygehus ansættes mindst en medisinsk og en kirurgisk overlæge", og ynskti nevndin eisini at fáa frágreiðing um, hví hetta er tikið burtur í lógaruppskotinum. Landsstýrismaðurin svaraði, at tey smáu sjúkrahúsini seinastu mongu árini hava havt trupulleikar at skaffa sær kvalifiseraðar yvirlæknar til størvini, og tí var hetta tikið burtur, soleiðis at virksemið á smáu sjúkrahúsunum var í tráð við lógina og ikki sum nú, at lógin verður brotin orsakað av læknamangli.

Sjúkrahósstýrini førdu fram, at tey ikki sóu nakað, ið kundi verða til hindurs fyri, at tey kundu varðveitast við teimum heimildum, ið tey hava í dag.

Stýrini vóru samd um, at sjúkrahúsverkið sum heild var vel fyriskipað við góðum samarbeiði á ymsu sjúkrahúsunum og eisini í millum sjúkrahúsini.

Stýrini skutu upp at útseta lóggávuna, men bíða til tingmenn kunnu vera fullgreiðir yvir innihaldið og avleiðingarnar av hesi, umfram innihaldið í teimum reglugerðum, ið skulu gerast.

Sum fyrisett í lógini um stýrisskipan Føroya, so skal landsstýrið fara frá kollegialum stýri til ráðharrastýri á ólavsøku í ár, og hevur hetta við sær, at broytingar mugu gerast í galdandi lóg um sjúkrahúsverkið

Nevndin metir tað ikki vera rætt av løgtinginum at seta Deildina fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu undir § 2, stk. 1 í lógaruppskotinum.

Um landsstýrið ynskir deildina undir sjúkrahúsverkið, er møguleiki at leggja deildina sum serligan stovn í § 2, stk. 3 í lógaruppskotinum.

Nevndin metir, at neyðugt er við sjúkrahúsini at hava sjúkrahúsráð, ið landsstýrið setir. Ráðið eigur eftir nevndarinnar meting at geva landsstýrinum tilmæli um sjúkrahúsins líggjaætlan og um setan av leiðandi størvum innan læknaligt, røktarligt og ansitingarligt virksemi á sjúkrahúsinum.

Tað, at trupult hevur verið at fáa yvirlæknastørvini sett við Klaksvíkar og Suðuroyar sjúkrahús, rættvísger ikki, eftir nevndarinnar meting, at størvini ikki eiga at vera tryggjað í lógini. Landsstýrið eigur hinvegin at gera alt, tað er ment fyri at fylgja lógini.

Við at seta í lógina, at medisinskur og kirurgiskur yvirlækni skulu vera á øllum sjúkrahúsum, er bæði fakliga virksemið og tryggleikin hjá borgarunum betur.

Ein samd nevnd mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins við hesum broytingum og setir tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

til

uppskot landsstýrisins

§ 2, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Sjúkrahúsverkið fevnir um 3 sjúkrahús. Til Sjúkrahúsverkið hoyra eisini serligir stovnar."

§ 3 verður orðað soleiðis:
"Fyri hvørt av sjúkrahúsunum velur landsstýrið eitt fimmmanna sjúkrahúsráð, sum skal hava møguleika at viðgera øll mál sjúkrahúsinum viðvíkjandi."

Stk.2 verður orðað soleiðis:

"Nærri reglur viðvíkjandi sjúkrahúsráðunum, bygnaðinum og fyrisitingarligum viðurskiftum verða ásettar av landsstýrinum."

Í § 5 verður sum nýtt stk. 4 sett:

"Við hvørt av sjúkrahúsunum verður í minsta lagi skipað/sett eitt medisinskt og eitt kirurgiskt yvirlæknastarv."

"Stk. 4 í § 5 í uppskoti landsstýrisins verður stk. 5."

2. viðgerð 14. mai 1996. Broytingaruppskotið frá samdari trivnaðarnevnd varð samtykt við 22-0-0 atkvøðum. §§ 2, 3 og 5 soleiðis broyttar samtyktar við 23-0-0 atkvøðum. Uppskot landsstýrisins §§ 1-12 excl. §§ 2, 3 og 5 samtykt við 23-0-0 atkvøðum. Samtykt við 23-0-0 atkvøðum at beina málið soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

14. mai 1996 varð loyvi tingsins fingið at víkja frá úðarfreistini millum 2. og 3. viðgerð. Samtykt við 29-0-0 atkvøðum.

3. viðgerð 15. mai. Málið sum samtykt við 2. viðgerð endaliga samtykt við 29-1-0 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 89 frá 4. juni 1996.

F.L. j.nr. 915-38/95.

105 Skattafrádráttur fyri partapening

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Lasse Klein, vegna kristiliga fólkaflokkin, Føroya frambarðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

U p p s k o t

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verður gjørd henda broyting:

1) Sum nýggj § 33. nr. 16. verður sett:
"upp til 10.000,00 kr., sum í árinum eru settar sum partapeningur í smápartafeløg ella partafeløg, skrásett í Føroyum, tó í mesta lagi 30.000,00 kr. tilsamans í trý fylgjandi ár."

§ 2.

Henda lóg fær gildi 1. januar 1997.

Viðmerkingar:

Tørvur er á peningi til vinnuendamál á nærum øllum økjum, og tí er tørvur á, at ein partur av tøka peninginum, sum enn finst í Føroyum og í útlandinum, verður brúktur til vinnuskapandi tiltøk.

Hetta uppskotið miðar ímóti at fáa gongd aftur á vinnuna, og at fólk, sum seta pening í arbeiðsskapandi tiltøk yvir eitt ávist tíðarskeið fáa møguleika at draga upphæddina frá á sjálvuppgávuni. Hugsað verður um,

at øll fólk, sum seta partapening í smápartafeløg ella partafeløg, skrásett í Føroyum, skulu kunna draga frá upp til kr. 10.000,00 á sjálvuppgávuni eitt einstakt ár og upp til kr. 30.000,00 yvir trý fylgjandi ár.

Í Danmark hevur ein líknandi skipan verið í gildi í fleiri ár við góðum úrslitum, og sama er galdandi fyri Ísland, sum hevur havt slíka skipan síðani 1984 við sera positivum úrsliti fyri arbeiðsskapandi tiltøk.

Uppskotið hevur til endamáls at økja um áhugan fyri at seta pening í arbeiðsskapandi tiltøk, og at økta virksemið skal fíggja kostnaðin av uppskotinum, og við økta áhugamum fyri at seta pening í vinnuskapandi endamál, fara inntøkur landskassans at økjast sum frálíður.

Undir viðgerðini hevur spurningurin, um uppskotið bert skal fevna um ávísar nýggjar vinnur, verið viðgjørdur, umframt spurningin, um talan skal verða um ávísan aldursbólk av fólki, sum skulu fáa henda møguleika, men uppskotsstillarin metir tað ikki rætt, at seta avmarkingar í uppskotið, men at øll, sum hava tøkan pening, skulu hava henda møguleika.

1. viðgerð 11. apríl 1996. Málið verð beint í fíggjarnevndina, sum 26. apríl 1996 legði fram soljóðandi

Álit

Málið var lagt fram av Kristiligu Fólkaflokkinum, Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokk tann 23. mars 1996 og varð eftir 1. viðgerð 11. apríl 1996 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið, og undir viðgerðini býtti nevndin seg í ein meirluta og tveir minnilutar.

Meirlutin (Vilhelm Johannesen, Álvur Zachariasen, Kristian Magnussen, Finnbogi Ísaksson og Finnbogi Arge) tekur ikki undir við uppskotinum, vísandi til galdandi fíggjarlóg, har hallið er avmarkað til 159.419 mió. kr.

Minnilutin (Tórður J. Niclasen) hevur hesar viðmerkingar: Ásannandi, at verður uppskotið samtykt, kemur tað at stimbra hugin/møguleikarnar fyri arbeiðsskapandi tiltøkum, sum so harðligur tørvur er á.

Hetta er sostatt eitt uppskot sum upp á longri sikt kemur at økja um inntøkur landskassans. Sostatt eitt samfelagsgagnligt uppskot, sum umboð Miðflokksins tekur undir við og mælir tinginum til at samtykkja.

Ein annar minnilutin (Jørgen Niclasen) tekur undir við uppskotinum.

2. viðgerð 30. apríl 1996. Uppskotið fekk 8-1-17 atkvøður og fall.

106 Sjálvstøðug skatting av hjúnafelaga í privatum vinnufyritøkum

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Lasse Klein, vegna Kristiliga fólkaflokkin, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verður gjørd henda broyting:

1) Sum nýggj § 31 a verður sett:
"**§ 31 a.** Hjúnafelagi, sum hevur hin hjúnafelagan sum hjálp í vinnufyritøku síni, landbúnaði o.ø., tá talan ikki er um eitt partafelag ella eitt smápartafelag, hevur rætt til at býta inntøkuna av hesum virksemínum við hin hjúnafelagan við upp til 50% av inntøkuni, tó í mesta lagi 100.000 kr."

§ 2.

Henda lóg fær gildi 1. januar 1997.

Viðmerkingar:

Tann 23. februar 1995 samtykti Føroya Løgting við 28 atkvøðum at heita á landsstýrið um at leggja fram uppskot til broyting í skattalógini, ið hevur við sær rímuligari skatting av hjúnafelaga, ið hjálpir hjúnafelaga í hansara vinnufyritøku, men nú meira enn eitt ár er farið síðani tá, tykist einki at vera hent í málinum, og er hetta orsøkin til, at uppskotið um hesar broytingar verður lagt fram til tingsins viðgerð.

Í londunum kring okkum hava tey eina serliga skipan, sum danir kalla "medhjælpende ægtefæller". Við hesi skipan verður inntøka býtt sundur millum hjúnini eftir einum býtislykli. Í Føroyum er eingin møguleiki at býta inntøkuna millum hjúnafelagar, tað er beint tvørtur ímóti sera trupult hjá eini kvinnu t.d. at sleppa at skatta av landbúnuði, hóast hon situr við einum festi.

Heldur ikki "hjálpandi" hjúnafelagin hevur møguleika fyri at verða skattaður fyri seg, hóast viðkomandi tekur lut í arbeiðinum. Hetta er tí, at høvuðsreglan í okkara skattalóg er tann:

"Giftur maður verður skattaður av allari inntøku sínari og inntøku konu sínari, tá tey búgva saman." (§ 4, 1. stk. í skattalógini).

Víðari stendur:

"Kona, sum samskattað er við mannin, verður sett í skatt fyri seg av .... sjálvstøðugum virki ella vinnu uttan fyri vinnu og virki mansins." (§ 4, stk. 2. a, í skattalógini).

Tað eru røddir frammi av og á, sum royna at vísa á, at tað er órættvíst, at m.a. bøndur ikki hava møguleika at lata konuna skatta av einum parti av vinninginum, og at hjálpandi hjúnafelagin í øðrum vinnum ikki fær henda møguleika.

Soleiðis sum skattalógin er orðað, forðar hon fólki í privatu vinnuni fyri at fáa sama møguleika fyri inntøku á javnbjóðis støði eins og aðrir lønarbólkar, og ein broyting á hesum øki fer uttan iva at økja um virksemið hjá smáum familjufyritøkum og vaksa um møguleikarnar fyri øktari framleiðslu.

Hetta uppskotið hevur til endamáls, at samstarvandi hjúnafelagar skulu hava sonnu skattarættindi í egnum virki sum hjá øðrum ella eftir einum ávísum býtislykli, sum semja kann fáast um.

Treytin fyri at hjúnafelagin kann fáa rætt til at koma inn undir § 31 a, er, at viðkomandi er skrásettur sum hjálpandi hjúnafelagi. Eisini har annar hjúnafelagin ikki hevur meira enn 4 tímar arbeiðsdag í øðrum arbeiði, fær hann rætt til at koma inn undir skipanin, og har báðir hjúnafelagirnir hava sjálvstøðugt arbeiði hava bæði rætt til at býta inntøkuna/útslitið av virkseminum sínámillum.

Uppskotið kemur í fyrstu syftu at kosta landskassanum pening, men uttan iva fer áhugin fyrt øðrum møguleikum í vinnuni eisini at økjast, og harvið eisini landskassans inntøkur, men við tað at uppskotið ikki skal koma í gildið fyrr enn næsta ár, eru møguleikar at taka hædd fyri møguligum kostnaði fyri landskassan.

Mett verður at tað hevur fyrimun longu nú at fráboðað eina gildiskomu fyri næsta ár, soleiðis, at vinnun kann fyrireika seg uppá møguligar broytingar í góðari tíð.

1. viðgerð 11. apríl 1996. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 26. apríl 1996 legði fram søljóðandi

Álit

Málið er fagt fram av Kristliga Fólkaflokkinum, Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 25. mars 1996 og eftri 1. viðgerð tann 11. apríl 1996 beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og býtti nevndin seg í ein meirluta og ein minniluta.

Meirlutin (Vilhelm Johannesen, Álvur Zachariasen, Kristian Magnussen, Finnbogi Ísakson og Finnbogi Arge) tekur ikki undir við uppskotinum, við tað at landsstýri hevur sett ein arbeiðsbólk, ið arbeiðir við skattligu viðurskiftum hjá hjúnum, og væntandi verður hesin bólkur liðugur við arbeiðið 1. juni 1996.

Minnilutin (Jørgen Niclasen) tekur undir við uppskotinum.

Ein annar minniluti (Tordur Niclasen) tekur undir við málinum.

2. viðgerð 30. apríl 1996. Uppskotið fekk 8-1-12 atkvøður og fall.

107 Uppsøgn av avtalunum við danir

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Heini O. Heinesen, vegna fólkveldisflokkin fram søljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Føroya Løgting samtykkir at boða ríkisstjórnini frá, at tað ynskir avtalurnar við stjórnina settar úr gildi.

Viðmerkingar:
Støðan í Føroyum er so vónleys, at ein stórur partur av føroyska fólkinum er noyddur at rýma av landinum undan arbeiðsloysi og høgum skattatrýsli. Hetta er serliga komið av teimum avtalum, sum eru gjørdar við stjórnina síðan oktober 1992.

Sigast kann um hesar avtalur, at hetta eru rein "diktat" frá danskari síðu. Hetta er serliga komið fram undir tí orðagongu, sum var í samband við dómarakanningina.

Nýggjar upplýsingar koma fram hvønn einasta dag, ið benda á, at Føroya Løgting er villleitt.

Peningamál í Føroyum eru ríkismál, t.v.s. felagsmál; tí kann eingin ivi vera um, at tier kr. 2,7 miljardirnar, sum læntar vórðu frá danum at bjarga Sjóvinnubankanum og Føroya Banka, skuldu verið goldnar av danska ríkinum, har føroyingar bert eru 1/124 partur. Henda rokningin varð kalt og kyniskt hongd um hálsin á føroyska skattaborgaranum, sum nú er við at hoykna undir skattabyrðuni, og tá er bert talan um rentuna av hesi skufd. Aftral hesum kemur onnur skuld hjá landskassanum, sum er umleið tað sama, 3 miljardir krónur. Rentuútreiðslurnar á fíggjarlógini eru í dag upp á 500 miljónir krónur. Tað er partur av hesum rentuútreiðslum, sum hetta uppskot miðjar ímóti at fáa burtur, og skal tann sparda rentuútreiðslan brúkast til at lækka skattin og harvið kostnaðarstøðið í landinum, so kappingarføríð verður betur.

At sløðan er vónleys, kunnu sjálvi danir hugsa sær. Tað eru eisini danskir fíggjarfrøðingar, sum hava víst á tað sama; at um bankarnir skuldu bjargast av tí almenna, so áttu føroyingar bert at goldið 1/124 part av hesum kr. 2,7 miljarðunum, sum hesi tiltøk hava kostað føroyska skattaborgaranum higartil. Tá eru renturnar ikki tiknar við. Vanleikin er eisini tann, at meginparturin av hesum peningi er brúktur til at bjarga donskum kredittfeløgum. Tað kann tí vera ein spurningur, um føroyskir skattaborgarar skulu blíva við at gjalda rentu av hesum peningi, nú hann er farin at kasta av sær sambært roknskapinum fyri 1994 og 1995 hjá monopolbankanum.

Fíggingargrunnurin frá oktober 1992 hevur sveinað uttanfyri bæði føroyskt og danskt lógarøki. Peningurin, sum er settur í Fíggingargrunnin, er hongdur um hálsin á føroyska skattaborgaranum. Tí skuldi hesin grunnur verið skrásettur í Føroyum sambært galdandi lóg. Endamálið við grunninum var at virka í Føroyum og at skjóta nýggjan kapital inn í neyðkonnar føroyskar peningastovnar. Sambært sonu lóg skuldi meirilutin í nevndini verið búsitandi í Føroyum.

Tað, sum Føroya Løgting og landsstýrið eiga at gera - um ikki fólkaflytingin skal halda fram, er at fáa donsku stjórnina at taka ábyrgd av teimum skeivleikum, sum stóðust av tí heimastýri, sum teir smoygdu niður yvir høvdið á føroyingum ímóti fólksins vilja, tá ið vit atkvøddu okkum leysar av Danmørkini á fólkaatkvøðunni, 14. september 1946. Úrslitið av hesum má so verða, at danir strika 123/124 partar av kr. 2,7 miljardum við rentum, sum er danski parturin av at bjarga bankunum. Tá kunnu vit fara í holt við at lækka skattatrýstið samsvarandi, so tað aftur fer at loysa seg at arbeiða í Føroyum. Skuldina, sum tá verður eftir, kunnu vit gjalda dønum, tá ið oljan er farin at renna úr føroysku undirgrundini.

1. viðgerð 17. apríl 1996. Málið varð beint í uttanlandsnevndina, sum 8. mai 1996 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Tjóðveldisflokkinum 25. mars 1996 og eftir 1. viðgerð 17. apríl 1996 beint í uttanlandsnevndina.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í 6 minnilutar.

Minnilutin (Atli Hansen og Marita Petersen) tekur ikki undir við málinum.

Minnilutin (Jógvan Durhuus) tekur undir við málinum.

Minnilutin (Helena Dam á Neystabø) er samd við uppskotsstillaran, at peningamál í Føroyum eru felagsmál, og at spurningurin um bankabjargingarnar í Føroyum í 1992 og 1993 tí enn er óavgreiddur. Tó kann minnilutin ikki taka undir við málinum og viðmerkingum til málið, ið als ikki lýsa avleiðingarnar av at siga upp avtalurnar við dousku stjórnina.

Minnilutin (Bjarni Djurholm) førir fram:

Vísandi til uppskot fólkafloksins nr. 39/95: Uppgerð av uttanlandsskuldini og ta viðferð hetta uppskot fekk undir 1. viðgerð 22. februar 1996, har tjóðveldisflokkurin valdi at vera burturstaddur, og so undirløkuna undir 2. viðgerð, undrast minnilutin á, at tjóðveldisflokkurin **nú** vil siga upp avtalurnar við danir.

Endamálið við uppskoti fólkafloksins var at loysa skuldarsparning landskassans og harvið óvissuna um hvussu skuldin skal avdragast. Verandi skuldarstøða er sum kunnugt um at forkoma fortreytunum fyri framskygnum, skynsomum og støðugum politikki, tí

- at landskassaskuldin nú táttar í 7 mia umframt kommunu- og interkommunala skuldin, sum er uml. 2.5 mia, ella íalt 9.5 mia,
- at alsamt hækkandi árliga rentubyrða landskassans nú rundar ta hálvu milliardina og at henda byrða fer at økjast munandi, tá avdrøgini falla til gjaldingar,
- at blokkstuðulin verður heilt burtur sum rakstrarískoyti til føroyska búskapin í næstum,
- at ótrygga støðan við uttanlandsskuldini ger, at skattatrýstið ikki kann lækka,
- at øll óvissan um skuldarbyrðu landskassans ger, at vinnan ikki kennir framtíðar búskaparkarmarnar og tí er sera trek at gera íløgur,
- at tað er ivasamt, sleppur gongdin ótálmað at halda fram, um Føroyar nakrantíð koma fyri seg aftur.

Uppskot fólkafloksins bygdi á tær fíggjarligu fortreytir, sum eru karmar um føroyska búskapin, og sum løgtingið hevur ávirkan á.

Fólkaflokkurin førdi fram í uppskotinum, at tað er bráðneyðugt, at løgtingið semist um eina loysn á hesum álvarsmáli at leggja fyri høvuðskreditor okkara.
Verður blokkurin nýttur at loysa landskassan frá uttanlandsskuldini, verður gjørligt at skapa tryggar og varandi karmar um framburð í landinum.

Í álitinum til hetta uppskot fólkafloksins førdi tjóðveldisflokkurin fram, at uppskotið **fór at taka av ætlanina hjá stjórnini** viðvíkjandi búskapargongdini í Føroyum. Tí kundi tjóðveldisflokkurin ikki taka undir við uppskoti fólkafloksins tá atkvøtt varð um hetta mál í farnu viku.

Við støði í hesi margháttligu støðutøku, er ilt at síggja nakran álvara í uppskoti tjóðveldisfloksins um at siga avtalurnar upp við danir, tá flokkurin fyri bert fáum døgum síðani skrivliga hevur boðað frá, at hann ikki vil taka av ætlanina hjá donsku stjórnini, tá ræður um framtíð Føroya.

Minnilutin hevur tí einki álit á, at uppskotið er kjølfest í eini sannføring um at taka neyðugu stigini at loysa Føroyar frá donsku búskaparligu fyrimyndini.
Fyrimyndin, sum hevur tambað føroyska kostnaðarstøðið og harvið avlagað kappingarførið soleiðis, at ilt er at hóma nakra búskaparliga framtíð fyri land okkara.

Hóast hesa greiðu andsøgn millum uppskot tjóðveldisfloksins um uppsøgn av avtalunum við danir og floksins støðu annars í verki tá ræður um at skapa búskaparligar fortreytir, so vinnuligt virksemi aftur kann fóta sær í kappingini við umheimin, so tekur minnilutin undir við, at avtalurnar við danir eiga at verða sagdar upp.

Bert við at endurskoða og broyta sínámillum viðurskiftini millum Føroyar og Danmark, soleiðis sum Fólkaflokkurin m.a. skjeyt upp í løgtingsmáli nr. 39/95, verða skaptar fortreytir fyri framskygnum, skynsomum og støðugum politikki í Føroyum.

Minnilutin (Jenis av Rana) tekur ikki undir við uppskotinum og teimum viðmerkingum, sum eru knýttar at hesum. At geva øðrum tjóðum og fólkum skuldina fyri ta vónleysu støðu, Føroyar eru komnar í, er lítið mansligt fyri teir politikkarar okkara, sum gingu undan, hæði í skilaleysari stýring av landi okkara og í sokallaðum samráðingum við m.a. danir - samráðingum, sum rættast er at kalla treytaleyst knæfall fyri mótpartinum. Meiri virðiligt hevði verið at trivið í egnan barm, játtað egnan mátt - og dugnaloysi í farnum døgum, og síðani satnan sett úl í nýggja kós - væl brynjað við royndunum, farna tíðin átti at havt givið hvørjum okkara.

Eru beinleiðis skreivleikar frambir móti okkum sum tjóð, ber annars til at fáa slík mál viðgjørd í hartil ætlaðum forum.

Minnitutin (Ingeborg Vinther) fører fram:

Undirritaða tekur undir við uppskotum við teirri viðmerking, at tað má vera møguleiki fyri at broyta hesar avtalur, ið eru við til at niðurbinda alt landið, vanligt er at avtalur, ið verða gjørdar, eisini kunna sigast upp fyri at fáa nakað betri.

Minnitutin (Ingeborg Vinther) tekur ikki undir við, at danir hava alla ábyrgdina av tí vónleysu fíggjarstøðu, landið er í, vit eiga eisini okkara part av ábyrgdini.

2. viðgerð 14. mai 1996. Uppskotið fekk 8-0-16 atkvøður og fall.

108 Broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Helni O. Heinesen, vegna tjóðveldisflokkin fram saltjóðandi

Uppskot

til

broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap.

§ 1

Í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap við seinni broytingum, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 9 verður stk. 2 orðað soleiðis:
"Landsstýrinum verður heimilað við kunngerð at áseta reglur um:
1) hvussu fiskiskapurin skal fara fram,
2) minstamát,
3) friðað øki og friðingartíðir, undantikið tey, ið nevnd eru í § 9a,
4) fiskireiðskap og nýtslu hansara og
5) veiðihættir."

2) Sum nýggj § 9 a verður sett:
" **§ 9 a.** Veiða við skovlváð, troli, snurriváð ella líknandi reti er ikki loyvd í teimum tilskilaðu tíðarskeiðunum og leiðunum:
Alt árið innanfyri linjur drignar 12 fjórðingar frá grundlinjunum. Frá forboðnum eru tó tey fiskifør undantikin, ið hava serloyvi til troling og royndir, sum Fiskirannsóknarstovan skipar fyri.

a) Í tíðarskeiðinum 1. januar til 31. december, báðir dagar íroknaðir, á
Føroya Banka innanfyri linjur drignar millum hesi 7 støðini og í hesi raðfylgju:
1. 60°50'00"N 07°57'00"V
2. 61°03'00"N 07°57'00"V
3. 61°15'30"N 08°16'00"V
4. 61°13'20"N 08°42'12"V
5. 61°00'00"N 09°11'00"V
6. 60°48'40"N 09°25'00"V
7. 60°24'00"N 09°07'00"V
tó soleiðis, at í tíðarskeiðinum frá 1. september til 31. mai, báðir dagar íroknaðir, er loyvt at veiða innanfyri linjur drignar millum hesi støð:
1. 60°50'00"N 07°57'00"V
2. 60°57'20"N 07°57'00"V
3. 60°45'40"N 08°37'00"V
4. 60°36'30"N 08°45'00"V
5. 60°26'00"N 09°08'25"V
6. 60°24'00"N 09°07'00"V
Hetta veiðubann fevnir ikki um beinleiðis veiði eftir síld og makreli við krattblokki.

b) Í tíðarskeiðinum frá 20. januar til 1. mars, báðir dagar íroknaðir, innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi raðfylgju:
1. 61°10'00"N 09°35'00"V
2. 61°35'00"N 09°35'00"V
3. 61°35'00"N 09°20'00"V
4. 61°28'00"N 09°20'00"V
5. 61°10'00"N 09°28'00"V

c) Alt árið 12 fjórðingum úr grundlinjunum og innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi raðfylgju:
1. 61°44'48"N 07°43'18"V

2. 61°32'48"N 08°20'30"V.
3. 61°49'00"N 08°41'48"V
4. 61°57'00"N 08°16'30"V.
5. 61°57'00"N 07°59'30"V.

d) Alt árið 12 fjórðingum úr grundlinjuni og innanfyri linjur drignar millum hesi støðini og í hesi raðfylgju:
1. 62°26'05"N 07°30'00"V
2. 62°30'00"N 07°30'00"V
3. 62°30'00"N 08°00'00"V
4. 62°35'00"N 08°00'00"V
5. 62°47'00"N 07°12'05"V
6. 62°47'00"N 06°30'00"V
7. 62°35'00"N 06°30'00"V

e) Í tíðarskeiðinum frá 1. apríl til 31. januar, báðir dagar íroknaðir, 12 fjórðingar úr grundlinjunum og innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi raðfylgju:
1. 62°25'00"N 05°52'00"V
2. 62°25'00"N 05°16'00"V
3. 62°03'00"N 05°18'00"V
4. 62°03'00"N 05°50'00"V
5. 62°00'00"N 05°50'00"V
6. 62°00'00"N 05°57'05"V

f) Alt árið 12 fjórðingar úr grundlinjunum og innan fyri linjur drignar millum hesi støðini og í hesi raðfylgju:
1. 61°12'00"N 06°22'00"V
2. 61°00'00"N 06°22'00"V
3. 60°56'00"N 06°09'00"V
4. 60°45'00"N 06°13'00"V
5. 60°45'00"N 06°36'00"V
6. 61°27'00"N 07°30'00"V
7. 61°32'30"N 07°27'00"V

g) Alt árið 12 fjórðingar úr grundlinjunum og innan fyri linjur drignar millum hesi støðini og í hesi raðfylgju:
1. 61°37'00"N 07°33'00"V
2. 61°30'00"N 07°45'00"V
3. 61°26'00"N 07°45'00"V
4. 61°26'48"N 07°49'12"V
5. 61°27'18"N 08°04'00"V
6. 61°29'00"N 08°10'00"V
7. 61°30'30"N 08°13'00"V
8. 61°34'30"N 08°15'00"V
9. 61°36'00"N 08°10'00"V
10. 61°31'30"N 07°56'00"V
11. 61°41'00"N 07°38'30"V

h) Í tíðarskeiðinum frá 1. januar til 31. desember báðir dagar íroknaðir, millum 12 og 19 fjórðingar frá grundlinjuni millum breiddarstigið 61o57'00"N og 315° rættvísandi úr Barðinum (62°08'48"N 07°26'00"V).

i) Í tíðarskeiðinum frá 1. januar til 31. desember báðir dagar íroknaðir, millum 12 og 19 fjórðingar frá grundlinjunum millum 315° rættvísandi úr Barðinum (62°08'48"N 07°26'00"V) og innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi raðfylgju:
1. 62°30'00"N 07°45'00"V
2. 62°30'00"N 07°30'00"V
3. 62°26'05"N 07°30'00"V
fyri fiskifør við maskinorku uppá 500 HK ella yvir, tó so at hestamegin fyri hvørt nýtt trol ikki fer upp um 500 HK.

j) Í tíðarskeiðinum frá 1. januar til 31. desember báðir dagar íroknaðir, millum 12 og 16 fjórðingar frá grundlinjunum og millum longdarstigið 06°30'00"V og breiddarstigið 62°25'00"N fyri fiskifør við maskinorku uppá 500 HK ella yvir, tó so at hestamegin fyri hvørt nýtt trol ikki fer upp um 500 HK.

k) Í tíðarskeiðinum frá 1. januar til 31. desember, báðir dagar íroknaðir, innanfyri linjur drignar millum hesi støðini og í hesi raðfylgju:
1. 60°54'00"N 06°04'00"V
2. 60°51'00"N 06°04'00"V
3. 60°51'00"N 05°56'00"V
4. 60°54'00"N 05°56'00"V

l) Í tíðarskeiðinum frá 1. januar til 31. desember, báðir dagar íroknaðir, innanfyri linjur drignar millum hesi støðini og í hesi raðfylgju:
1. 60°26'00"N 06°32'00"V
2. 60°35'00"N 06°35'00"V
3. 60°35'00"N 06°09'00"V
4. 60°26'00"N 06°10'00"V"

§ 2

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir at hon er kunngjørd.

Semja

Undirritaðu felagsskapir eru samdir um at gera hesar broytingar í ikki lýstu kunngerðini nr. 201 um broyting í kunngerð um ríkiskapin á landleiðunum við fiskiførum, sum eru skrásett í Føroyum.

1. Kalvakassin B verður minkaður nakað vestureftir, fyri at djúpvatnstrolarnir fáa royni eftir 350 fv.
2. Kassi C broyttur í semju millum trol og hók og ídnaðarveiðu fyri at geva fraegastu raesir fyri hvørjum øðrum.
3. Kassi D broyttur soleiðis, at norðasta lingan gongur eftir 62 gradir og 47 minuttir ella um 250 fv.

dýpi fyri at bæði snella og trol (djúpa vatnið) fáa sínar leiðir.

4. Kassi E eystan fyri opin tíðarskeiðið 1. febr. til 30. mars vegna uppsaveiðuna við troli og sunnari kantur broyttur 3 fj. longur norður vestur til Oyragrynnuna vegna trol- og ídnaðarveiðuna. Henda broyting er mótvegis Skeiva Banka (pkt. 6).

5. Kassi F víðkaður allan vestara kantin til eisini at fevna um gamla kassa G til tess at vejta rúmari ræsur hjá línuveiðuni.

6. Allt Skeivi Banki stongdur vegna snelluveiðu afturfyri tað, som er latið av kassa E. Ídnaðarveiðan fær somu leiðir vestanfyri hóast hetta.

Vit mæla tí Føroya Landsstýri og Fiskivinnunevnd Føroya Løgtings til, at hjálgda uppskot til kungerð verður sett óbroytt í verk.

Undirritaðu feløg eru samd um at mótmæla, at kvotaskipan verður sett í verk.

Tórshavn 4. jan. 1994. Meginfelag Útróðrarmanna, Felagið Snelluskip, Felagið Línuskip, Felagið Ídnaðarskip, Felagið Trolskip.



Vaktar- og Bjargingartænastan
Yvirt v/Strond - Tórshavn



Samtykta friðingin hjá landsstýrinum og fiskivinnunevndini, sum onganlíð er lýst.

Viðmerkingar:

Løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap kom í gildi 11. mars 1994, samstundis fóru úr gildi allar aðrar lógir um fiskiskap á føroyska landgrunninum.

Síðani er tað hent, at vit hava fingið nýggja stýrisskipanarlóg fyri Føroyar, sum hevur tikið so gott sum allan myndugleika frá fiskivinnunevndini nú (vinnunevndini).
Fyrr var tað soleiðis, at fiskivinnunevndin skuldi góðkenna allar kunngerðir viðvíkjandi fiskivinnuni. Øll sagt soleiðis, sum hesar kunngerðir vóru oraðar: Føroya landsstýri saman við løgtingsins fiskivinnunevnd.

Tað er tí neyðugt at lóggeva meira nágreiniligt, um løgtingið í heila tikið skal hava nakra sum helst ávirkan á tað, sum hendir í okkara samfelag.

Tá fiskivinnunevndin viðgjørdi lógaruppskotið um vinnuligan fiskiskap, varð semja um, at friðingar, sum vóru galdandi alt árið, skuldu setast inn í lógina, tá nýggja stýrisskipanarlógin kom í gildi.

Her er talan um § 9. stk. 2, sum ikki kann verða í gildi sambært stýrisskipanarlógini.

Tí verður skotið upp at seta sum nýggja § 9 a inn í sjálva lógina kunngerð nr. 3 frá 6. januar 1994. Hetta førir sjálvandi við sær at hesin partur av kunngerð nr. 52 frá 26. mars 1993 fer úr gildi, tá henda lógarbroyting kemur í gildi.

Tað hevur víst, at hesi trolfríu økir hava virkað so væl, at sjálvt teir, sum umboða trolaraflotan hava víst á, á almennunum fundi í Norðurlandahúsinum, at tað eru tey trolfríu økini, sum hava gjørt at tað er meira at fiska serliga av toski. Tí tað eru serliga hýsu og toskaleiðirnar, sum eru stongdar fyri trolveiðu.

Hetta hevur so ført við sær, at serliga búkaflotin hevur fingið betri fiskarí serliga norðanfyri og vestanfyri Føroyar. Ja, vit kunnu gott siga, at línubátarnir hava ongantíð, síðani teir komu fyri 30-35 árum síðani, fingið so gott fiskarí norðan fyri Føroyar sum seinasta árið.

1. viðgerð 9. apríl 1996. Málið varð beint í vinnunevndina, sum 12. apríl 1996 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av tjóðveldisflokkinum tann 25. mars 1996 og eftir 1. viðgerð tann 9. apríl 1996 beint í vinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og hevur undir viðgerðini býtt seg í fimm minnilutar.

Minnilutin (Heini O. Heinesen, Lasse Klein og Álvur Zacharlasen) tekur undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja fyriliggjandi uppskot.

Minnilutin (Atli Hansen) tekur støðu í tingsalinum.

Minnilutin (John Petersen) vísir á, at spurningurin um at lógarfesta friðingamar hongur saman við uppskotinum um fiskidagaskipan (løgtingsmál nr. 96/1995). Minnilutin (John Petersen) tekur støðu í tingsalinum.

Minnilutin (Henrik Old) tekur støðu í tingsalinum.

Minnilutin (Óli Jacobsen) tekur støðu í tingsalinum.

2. viðgerð 22. apríl 1996. Samtykt við 23-0-0 atkvøðum at beina málið til 3. viðgerð.

3. viðgerð 29. apríl 1996. Málið endaliga samtykt við 24-0-1 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 64, 20. mai 1996.

109 Broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Jákup Olsen, vegna Kristiliga fólkaflokkin, Føroya framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan við seinni broytingum verður gjørd hendan broyting.

1) § 1 verður orðað soleiðis:
"Vísandi til § 54 í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verður skattur teirra, ið nevnd eru í § 1 nr. 1-6 og § 2 stk. 1 litra d, e og f í somu lóg til landskassan ásettur til 25% av skattskyldugu inmøkuni."

§ 2.

Henda lóg fær gildi 1. januar 1997.

Viðmerkingar:

Sitandi samgonga skuldi eitast at gera skattalækkingar. Hesar mumu so lítið, at fólk als ikki løgdu merki til á lønarútgjaldingini, at nøkur skattalækking i heila taki fór fram.

Hóast Føroya fólk av hjarta ynskir broyting í tí førda politikkinum, so hevur verið sera trupult hjá samgonguni at skapt neyðugar fortreytir fyri broytingum yvirhøvur, og gongdin síðani valið hevur víst tørvandi hegni at loysa vandamál. Hetta eru vit daglilga vitni til, og hardagin innanhýsis í Tinganesi harðnar alsamt sum tíðin gongur. Landsstýrismenn "tosa" sínamillum í bløðunum, ella senda brøv sínámillum innanhýsis. Hetta er at harmast um.

Eitt av teimum heilt stóru vandamálunum í dag er skatta- og avgjaldstrýstið í Føroyum, og sum hevur sera óhepnar búskaparligar avleiðingar við sær. Tí er alneyðugt at lækka skatta- og avgjaldstrýstið.

Upp undir seinasta val vóru eisini flestu flokkar, sum bjóðaðu seg fram, samdir um, at neyðugt varð at steðga afturgongdini í samfelagnum, men so varð ikki. Samanfelggingar og bygnaðarbroytingar halda áfram sum ongantíð. Ikki tí, at nakrar sparingar eru í hesum, men tí, at tað er eftir boðum frá dønum. Nú skulu sersjantar og generalar við gullsnórum og vinklum og kaskett á høvdinum útnevnast á okkara stovnum, sum í bestu Gablatíð hjá føroyingum.

Tað er fyrst og fremst verandi skattatrýst, sum hevur óhepnar búskaparligar avleiðingar við sær, og tí er alneyðugt at lækka trýstið: alt Føroya fólk er samt um, at skatta- og avgjaldsstøðið í landinum er alt ov høgt.

Neyðugt er at fáa lønsemi í hjá tí einstaka, og sum støðan er, fáa heldur ikki tey við arbeiði og eini rímiligari inntøku, endamar at røkka saman.

Tí finst eingin møguleiki uttan um spurningin at lækka skatta- og avgjaldstrýstið munandi.

Kristiligi Fólkaflokkurin hevur gjørt fleiri royndir at bøta um hest viðurskifti, og upp undir valið gjørdi flokkurin heilt greitt, at neyðugt var við einum grundleggjandi broyttum búskapar- og vinnupolitikki fyri at fáa landið aftur á føti: at lækka persónsskattingina og avgjaldsstøðið og at lækka kostnaðarstøðið hjá fólki og vinnuni.

Kristiligi Fólkaflokkurin meinti nakað við sínum ætlaða politikki og helt eisini fast um ætlunirnar, tó ið samgongusamráðingarnar byrjaðu aftan á valið. Hesar samráðingar høvdu sum úrslit eina avtalu, sum, um hon varð fram, heilt skjótt hevði gjørt tað liviligt aftur í Føroyum.

Í dag mugt vit sanna, at tað var stórt spell og ein vanlukka fyri fólk okkara, at hetta ikki bleiv veruleiki, og at aðrir flokkar, sum høvdu fingið veljarans dóm, tóku yvir og halda fram við 90-ára politikkinum, sum Føroya fólk heilt greitt vrukaði við valið 1994.

LÆKKING AV LANDSSKATTINUM

Við einum nógv lækkaðum landsskattaprosenti verður inntøka landskassans frá persónsskatti vel lægri 1. árið, men sum frá líðnir, hækkar skattainntøkan aftur við óbroyttum skattaprosenti.

Við øktari keypiorku hjá fólki fara brúksgjøldini at geva størri inntøku til landskassan, sjálvt um prosentið verður lækkað.

Eftir uppskotinum fer
fíggjarlógin at síggja soleiðis út:

Inntøkur	2.050.000
Útreiðslur	1.850.000
Avlop	200.000
-Renta	460.000
Hall	260.000

sum verður at fíggja við lánsbrøvum.

Neyðugt er tí at fremja eina heildarætlan: eina loysn eftir føroyskum fortreytum, har øll vandamálini verða viðgjørd undir einum, og at fáa hana at virka sum skjótast fyri at fáa gongd á búskapin aftur, og tí mæla vit eisini til, at besit partar verða tiknir upp til viðgerðar beinanvegin:

a) Fíggjarlógin
b) Viðurskiftini millum landskassan og ríkiskassan.
c) Vinnulívsbroytingar.
d) Setnúsaviðurskiftir.
e) Kostnaðarstøðið saman við: Skatta- og avgjaldsstøðinum.

Um lógaruppskotið verður samtykt, verður nágreinilig útgreining gjørd av fíggjarlógarpostinum.

1. viðgerð 11. apríl 1996. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 26. apríl 1996 legði fram soljóðandi

Á l t t

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum, Føroya framburðs- og liskivinnuflokki tann 25. mars 1996 og varð eftir 1. viðgerð 11. apríl 1996 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meirluta og ein minniluta.

Meirlutin (Vilhelm Johannesen, Álvur Zachariusen, Finnbogi Ísakson, Kristian Magnussen og Finnbogi Arge) tekur ikki undir við uppskotinum.

Minnilutin (Jørgen Niclasen og Tórður J. Niclasen) tekur undir við uppskotinum, og hevur í hesum sambandi hesar viðmerkingar: "Vantandi lønsemi hjá tí einstaka, vantandi lønsemi hjá vinnulívinum og vantandi lønsemi hjá landskassanum eru veruleikar, ið liggja sum haft um beinini á øllum framburði í føroyska samfelagnum. Høgur skattur og høg avgjøld og harvið høgt kostnaðarstøði hjarga hvørki landskassa, tí vinnuliga ella tí privata húsarhaldinum. Seinastu árini hava víst júst tað mótsatta.

Fyri nøkrum árum síðani, var partafelagsskatturin lækkaður úr 49% niður í 22%, og inntøkurnar til landskassan mærum tvífaldaðust. Í tjør var skrásetingargjaldið til akfør lækkað við tí úrsliti, at inntøkur landskassans hækkaðu munandi, og sum tað feskasta dømið er skattalættin, ið var latin frá 1. januar 1996, har vit longu sígggja ein vøkstur í skattainntøkunum bæði fyri landskassan og kommunukassar.

Hetta eru talandi prógv fyri hvønn veg vit eiga at ganga. Fyriliggjandi uppskot byggir á eina fíggjarlóg á nógv bílligari støði enn tann núverandi, og tí er neyðugt við nógvum fylgibroytingum, um uppskotið verður samtykt. Um hesar skulu koma í gildi 1. januar 1996, er neyðugt at bróta upp um arnar beinanvegin. Um løgtingið samtykkir fyriliggjandi uppskot, er neyðugt, at løgtingið eisini fer fylgibroytingar samtyktar, og tað álit hevur minnilutin á løgtinginum, og mælir minnilutin tí løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 30. apríl 1996. Uppskotið fekk 9-2-14 atkvøður og fall.

110 Frádráttur í sjálvuppgávuni fyri gávur til vælgerandi endamál

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Lasse Klein, vegna Kristiliga fólkaflokkin, Føroyar framburðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

Uppskot

til

<u>Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt</u>

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verður gjørd hendan broyting:

1) Í § 33 verður sum nýtt nr. 17) sett:
"Skjalprógvaðar gávur til kristiligt og mannagott arbeiði við upphædd, sum er onnan fyri 500 kr., upp til 3.000 kr., fyri hjón upphædd, sum er onnan fyri 1.000 kr., upp til 6.000 kr."

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar:

Føroyingar hava allar dagar givið nógv til kristiligt og mannagott arbeiði. Tað hevur ikki staðið á, tá ið fólk eru komin í neyð og skulu hava hjálp.

Sjálvboðnu felagsskapirnir hava verið sera vel stuðlaðir í Føroyum, og teir hava gjørt eitt framúrskarandi gott arbeiði, sum eisini bróðratjóðir okkara hava notið vel av. Teir hava vunnið fjóðini virðing og sómd, sum illa kann metast í krónum og oynum.
Men ráðini hjá fólki til at stuðla hesum arbeiði eru nógv versnað tey seinastu árini. Viljanum bagir einki,

men nógv stunda illa í tí og hava engan pening at geva av. Beinleiðis skaturin fer við stívari helvt av lønini, tey nógvu avgjøldini (ALS, MVG, Samhaldsfasti, trygging v.m.) saman við útreiðslunum til bústað, mat og klæði eru heldur ikki smá, so at lítið loypur av til at stuðla við og geva burtnav.

Tað er trupult at meta um kostnaðin av einum tílíkum uppskoti sum hesum, men um vit hava í huga, at føroyingar altíð hava stuðlað vel, og hvørt húski í Føroyum letur uml. 500,00 kr. til tílík endamál, so verður úrslitið hetta:

16.000 húski lata í meðal 3.000,00 kr. .....480.000,00 kr. árliga

Samlaði frádrátturin verður sostatt .....1.500,00 kr. pr. húski
og fyri landskassan merkir hetta eina minni-
inntøku upp á 55% av 1.500,00 ella 825,00 pr.
húski og árliga .....247.500,00 kr.

Fyri kommununar merkir hetta eina minni-
inntøku upp á 45% av 1.500 ella 675,00 pr.
húski og árliga .....202.500,00 kr.
Tils. fáa almennu kassarnir eina minnitinntøku
upp á .....450.000,00 kr.

Illa kunnu vit í Føroyum vera tað arbeiðið fyriuttan, sum gjørt verður gjøgnum sjálvbodnu felagsskapirnar. Serliga nú, ið tíðirnar eru so ringar og nógv ikki kláru seg. Hesir felagsskapir treða til, har almenna trygdarnetið ikki fær komið, og taka sær ofta av teimum tyngstu sosialu byrðunum, ið eingin annar hattar sær undir. Tí er tað ikki meir enn rímligt, at løgting og landsstýri geva hesum virksemi ans og vátta tí sín stuðul.

Í grannalondum okkara hevur lann síður leingi verið nýttur, at gávur til vælgerandi endamál er loyvdur frádráttur í sjálvuppgávuni.

Í Danmørk er upphæddin 3.000 kr., sum hvørt persónur kann draga frá, tá ið gávan er 3.500 kr. Hjún kunnu draga upp til 6.000 kr. frá, tá ið gávan er 7.000 kr.

Henda skipan kemur sera vel við hjá teimum sjálvbodnu felagsskapunum, sum veita neyðstøddum hjálp, bæði innanlands og utanlands, sum Neyðhjálp Fólkakirkjunnar, Caritas, Reyða Krossi, Krossheri Kirkjunnar o.ø.

Vit eiga ikki at standa aftanfyri brøðratjóðir okkara í Norðurlondum.

1. viðgerð 11. apríl 1996. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 26. apríl 1996 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum, Føroyu Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 25. mars 1996 og varð eftir 1. viðgerð tann 11. apríl 1996 beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meirluta og tvær minnilutar.

Meirilutin (Vilhelm Johannesen, Álvur Zachariasen, Kristian Magnussen og Finnbogi Ísakson) tekur ikki undir við uppskotinum.

Minnilutin (Tórður Niclasen og Finnbogi Arge) tekur undir við uppskotinum.

Ein annar minnilutí (Jørgen Niclasen) tekur støðu í tingsalinum.
2. viðgerð 29. apríl 1996. Uppskot frá Sverri Midjord um at heimvísa málið aftur í nevnd fekk 9-0-17 atkvøður

og fall. Samtykt við 15-0-11 atkvøðum at leina málið til 3. viðgerð.

15. mai 1996 legði Lasse Klein legði vegna seg sjálvan og løgtingsmenningar Anfinn Kallsberg, Óla Breckmann, Jákup Olsen, Jørgen Niclasen, Tórður J. Niclasen og Finnboga Arge fram soljóðandi

Broytingaruppskot

1) Í § 33, verður "3.000 kr." broytt til "1.500 kr.", "6.000 kr." broytt til "3.000 kr.". Skoytt verður uppí seinasta punktum: "Landsstýrinum verður heimilað at gera reglugerð fyri sjálvboðnu felagsskapirnar, sum koma inn undir hesa skipan".

Viðmerking:

Av tí at ivi hevur tikið seg upp um kostnaðin av einari slíkari broyting, mæla uppskotsstillararnir til at lækka upphæddirnar, soleiðis at skipanin kann virka sum ein royndarskipan.

Eisini halda uppskotsstillararnir tað vera neyðugt, at landsstýrinum verður heimilað at gera reglugerð fyri sjálvboðnu felagsskapirnar, sum koma inn undir hesa skipan, og í hesum sambandi er hjálagt "Cirkulære frá Told og Skat í Danmark".

Hóast tað ikki hevur eydnast at fingið endaligu hagtolini yvir samlaðu gevararnar í Danmark, sum gera brúk av slíkari skipan, er tað kortini mangt, sum bendir á, at nýtslan av frádrátinum hevur ikki verið nógv brúkt.

Uppskotsstillararnir meta, at umleið 10% - 15% av skattaborgarunum koma at gera nýtslu av hesi skipan 1. árið og at kostnaðurin tí verður í mesta lagi tað, sum uppskotsstillarin metti í sínum uppskoti.

3. viðgerð 15. mai 1996. Broytingaruppskotið fekk 8-2-20 atkvøður og fall. Upprunauppskotið fekk 9-1-20 atkvøður og fall.

111 Endurskoðan av navnalóggávuni.

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Lasse Klein, løgtingsmaður, vegna Kristiligu Fólkaflokkin - Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokk fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Heitt verður á landsstýrið um at endurskoða navnalógina frá 1992 og leggja uppskot um neyðugar broytingar í lógini fyri løgtingið.

Viðmerkingar:

Tá ið løgtingslógin um fólkanøvn endaliga kom í 1992, var tað ikki annað enn vanlandi, at hon elvdi til

stóra misnøgd, tí at broytingarnar vóru so nógvar og stórar.

Listin yvir fornøvnini, sum loyvd eru at geva børnum, er framvegis so lítil, at har er bara triðingurin av øllum teimum fornøvnum, sum føroyingar í dag eita.

Avtalur eru ongar gjørdar t.d. við dansku myndugleikarnar. Tí ber nú til hjá føroyingum, sum fáa nei til eitt navn í Føroyum, at fara eina ferð niður til Danmarkar og har doypa børn síni við nøvnunum, sum teir føroysku navnamyndugleikarnir síðani hava bara at rætta seg eftir.

Dømi eru um, at hetta verður gjørt, sum varð ávarað móti, tá ið navnalógin var til viðgerðar á løgtingi. Onnur lond sum t.d. Ísland hava avtalur við grannalond, ið gera tað møguligt at umsita galdandi navnalóg.

Tað er í løtuni sera trupult í Føroyum, tí at ongar greiðar reglur og avtalur eru eitt nú við Danmørk, ið hevur eina beitt aðra navnalóg enn okkara.

Harumframt er føroyska navnalógin ógreið á tveiri økjum sum t.d. viðvíkjandi navnaskifti í samband við ættleiðing. Fyrr var tað ríkisumboðsmaðurin, sum var ættleiðingarmyndugleiki og eisini segði frá, hvat navn ættleidda barnið framyvir kom at bera. Nú sigur ríkisumboðsmaðurin bara frá ættleiðingini, men einki um nøvnini, børnini framyvir skulu eita.

Navnalógin gongur út frá, at ættleiddu børnini varðveita fremmandu fornøvn og millumnøvn sín. Í so máta er ættleiðing ikki javnstillað við føðing.

Royndirnar vísa, at sjálvt um landsstýrið hevur heimild til at geva loyvi til, at fremmandu for- og millumnøvn verða broytt, so verður lítið søkt um tað.

Heldur ikki nevnir navnalógin nakað um broyting av milltumnavni, um tað er loyvt á sama hátt, sum tá ið talan er um fornøvn og eftirnøvn.

Tað er vanligt, at nýggjar lógir, sum føra so stórar broytingar við sær, sum navnalógin hevur gjørt, verða tiknar upp til endurskoðingar eftir 3 árum, og er hetta eisini ørsøkin til uppskotið til samtyktar.

1. viðgerð 19. apríl 1996. Málið verð beint í rættarnevndina, sum 8. mai legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki tann 21. mars 1996 og eftir 1. viðgerð tann 19. apríl 1996 beint í rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og havt fund við Axel Nolsøe, landsstýrismann, Sørin P. Sørensen, fulltrúa og formannin í navnanevndini, Jóan H. Winther Poulsen.

Nevndin hevur býtt sig í ein **meiriluta** og ein **minnilata**.

Meirilutin (Bjørn á Heygum, Marita Petersen, Signar á Brúnni og Sune Jacobsen) hevur hesar viðmerkingar:

Tá ið nýggj navnalóggáva varð viðgjørd á tingi fyri góðum trimum árum síðani, var breið undirtøka fyri at samtykkja nýggja føroyska navnalóggávu.

Kristiligi Fólkaflokkurin - Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokkur mælir í uppskoti sínum til samtyktar at beita á landsstýrið um at endurskoða navnalóggávuna. Uppskotsstillarin førir fram, at galdandi lóggáva er ógreið og torfør at umsita. Undir fyrstu viðgerð av málinum vóru áskoðanirnar ymiskar um uppskotið. Til tess at lýsa støðuna so gjølla sum møguligt, avráddi rættarnevndin at kalla inn landsstýrismannin, Axel Nolsøe, ið umsitur hetta málsøki, og somuleiðis navnanevndina, sum dagliga tekur sær av málinum.

Eftir at hava umrøtt málið við landsstýrismannin, fulltrúan í landsstýrinum og umboð fyri navnanevndina, er meirilutin komin til ta niðurstøðu, at óneyðugt er at fremja broytingar á økinum.

Meirilutin (Bjørn á Heygum, Marita Petersen, Signar á Brúnni og Sune Jacobsen) tekur ikki undir við uppskotinum og setir einki uppskot fram.

Ein **minniluti** (Jógvan á Lakjuni) hevur hesar viðmerkingar:

Tað er at fegnast um, at føroyingar fingu egna lóg um nøvn í 1992, tí sjálvandi eiga vit her sum á øllum øðrum økjum at skipa fyri okkara egnu viðurskiftum. Eingin ivi kann heldur vera um, at vit eiga at hava eina navnalóg, soleiðis at skipað viðurskifti kunnu vera á hesum øki.

Sum tað so ofta er lýst fram, so er hetta eitt viðkvæmt mál, bæði tí at tað at geva eitt navn er persónligt, og so tað at mál okkara í øldir hevur verið í eini sera løgnari støðu -og ikki minst navnasiðurin.

Í viðmerkingunum til uppskotið verður nevnt, at tað kemur fyri, at føroyingar fara til Danmarkar at geva børnum sínum navn. Hetta kemst sjálvandi av, at fólk kenna tað sera løgið og óskiljandi, at tey ikki sleppa at geva børnunum eitt navn, sum er eitt beilt vanligt og gott navn.

Í § 1, stk. 3 í lógini stendur, at navnið skal vera í samljóð við føroyskur málreglur, og soleiðis eigur tað eisini at vera, men minnilutin (Jógvan á Lakjuni) heldur, at navnanevndin hevur tulkað hesa reglu ov trongliga. Tað kann ikki vera rætt at binda fólk so niður, at tey ikki sleppa at geva børnunum nøvn, sum í mong ættarlið hava livað í familjuni.

Hesin spurningur eigur avgjørt at verða tikin við í sambandi við, at lógin verður endurskoðað.

Er hesin parturin av lógini ov "trongur", so er tað øvugt í sambandi við eftirnøvnini, tí her er lógin eftir minnilutans tykki alt ov "liberal".

Í tí dansku lógini frá 1904 varð eftirnavnið nevnt "slægtsnavn", og soleiðis hava vit eisini upplatað eftirnavnið. Eftirnavnið er jú eitt ættarnavn, sum bindur okkum til eina ávísa ætt ella familju. Men í lógini er hetta fullkomiliga gjørt til einkis.

Um vit ímynda okkum, at ein Jógvan Joensen giftist við einari Anna Hansen, og tey fáa 6 børn, 3 gentur og 3 dreingir,- ja, so kunnu tey geva børnunum 6 ymisk eftirnøvn, t.d. Pætur Joensen, Lena Hansen, Kára Onnudóttir, Tóra Jógvansdóttir, Arni Jógvansson og Eyðun Onnuson. Og itu foreldrini Jógvan Hans og Anna Katrina, - ja so vóru 4 møguleikar afturat. Afturat øllum hesum kunnu tey eisini, um tey havu borið eitt annað eftirnavn, sum ikki er fingið við giftu, geva barninum tað.

Vit siggja, at hetta kann skjótt blíva ein øgiligur vavstur, og vit kunnu spyrju, hví hetta skal vera loyvt. Hví stendur tað ikki í lógini, at systkin skulu hava sama eftirnavn? Í tí dansku lógini frá 1904 stóð, at øll børn í sonu familju skulu hava sama eftirnavn. Hví er hetta broytt?

Sjálv meiningin við einum ættarnavni verður burtur við hesum, tí eitt ættarnavn talar jú um eitt søguligt samband. Gjøgnum ættarnavnið er tú ein liður í ættini. Minnilutin (Jógvan á Lakjuni) heldur, at ein regla eigur at verða sett inn í lógina, sum sigur at børn í einum hjúnalagi skulu hava sama eftirnavn. Og velja foreldrini í staðin fyri ættarnavn, at geva børnunum eftirnavn, ið er smansett av fornavni faðirs ella móður við -son ella -dóttir afturat í samsvari við kyn barnsins.

Minnilutin (Lasse Klein) hevur hesar viðmerkingar:

Í navnalógini § 4, 2. stk. stendur: "Millumnavn verður fráboðað í tí prestagjaldinum, har móðirin býr." Avgerandi er í føroysku lógini, hvar móðirin býr. Spurt verður ikki um annað. Kemur tú ein 90 ára gomul móðir og vil geva 70 ára gomlu dóttir sínu millumnavn, sum kann vera "Solfudóttir" ella "Jensen", so kann hetta verða gjørt við at sigu kirkjubókini frá, hair móðirin býr. Og hetta kann verða gjørt, uttan at 70 ára

gamla dóttirin veit av tí ella hevur góðkent tað. Hon kann búgva eina heilt aðra staðni í Føroyum.

Í donsku navnalóggávuni kann hetta ikki koma fyri, tí at har er aldursmarkið sett. Persónar yvir 12 ár skulu sjálvir vátta navnabroytingina. Men føroyska navnalógin sigur einki um eitt tílíkt aldursmark. Har kann ein og hvør vaksin koma at eita okkurt, sum móðirin vil, uttan sjálvur at verða eftirspurdur.

§ 4, stk. 4 í lógini stendur eisini um millumnøvn: "Millumnøvn kann verða strikað eftir fráboðun til sóknarprest í tí prestagjaldinum, har barnið varð skrivað í kirkjubók."

Nú verða børn ofta skrivað í fleiri kirkjubøkur, t.d. har móðirin býr, har skal barnið verða skrivað, men verður barnið doypt aðra staðir, verður tað eisini skrivað í ta kirkjubókina. Spurningurin kann tí vera, hvørja av hesum kirkjubókunum meinar lógin nú við, tá tú skal fara at fáa millumnavnið strikað.

Tað eigur at standa í lógini, at tú skalt venda tær til kirkjubókina, har tú ert føðiskrásettur, og tað er bara, har móðirin búði, tá tú vart føddur.

Í § 2, stk. 1, stendur: "Foreldur ella tey, ið foreldrarættin hava, skulu boða sóknarprestinum í tí prestagjaldinum, har móðirin býr, frá navninum innan ta freist, ið ásett er í § 1, stk. 1.

Fyri tað fyrsta hvør er sóknarprestur, sum førir og hevur ábyrgd av kirkjubókunum á staðinum. Hann er eisini jarðarferðarmyndugleiki. Henda broyting eigur at verða gjørd allastaðni í navnalóggávuni, har orðið "sóknarprestur" er nevndur, t.d. greinunum 3, 4, 7, 8 o.s.fr. Fyri tað næsta viðv. nevndu § 1, stk. 1. Hvar skal verða sagt frá, tá ið barn ikki hevur fingið navn innan teir 6 mánaðarnar, sum ásett í lógini? Hvør er kærustovnurin, presturin skal venda sær til í tí førinum?

Eisini eru ógreið viðurskifti viðvíkjandi navnaskifti í samband við ættleiðing. Fyrr var tað ríkisumboðsmaðurin, sum var ættleiðingarmyndugleiki og eisini segði frá, hvat navn ættleidda barnið framyvir kom at bera. Nú sigur ríkisumboðsmaðurin bara frá ættleiðingini, men einki um nøvnini børnini framyvir skulu eita. Royndirnar vísa eisini, at fá søkja.

Navnalógin gongur út frá, at ættleiddu børnini varðveita fremmandu fornøvn og millumnøvn sín. Í so máta er ættleiðing at javnstilla við føðing.

Ongar avtalur eru enn gjørdar við onnur lond, t.d. danskar myndugleikar, so sum § 18 heimilar landsstýrinum. Tí ber nú til hjá føroyingum, sum fáa nei til eitt navn í Føroyum, at fara eina ferð til Danmarkar og har doypa børn sín við nøvnunum, sum teir føroysku navnamyndugleikarnir síðani bara hava at rætta seg eftir.

Eisini skal gerast vart við, at í lógini verður einki sagt um broytingar av millumnøvnum. Tað stendur einki, um tað er loyvt á sama hátt, sum tá talan er um fornøvn og eftirnøvn, og heldur ongar tverri reglur eru um, hvussu lógin verður fraind. Víst verður í hesum sambandi til § 17.

Eisini heldur minnilutin, at listin yvir fornøvnini, sum loyvd eru at geva børnunum, framvegis er ov lítil - og at bara nøkur lá nøvn eru komin aftur at í trý ár. Hetta er bara ein triðingur av øllum teimum fornøvnum, sum føroyingar í dag eita.

Minnilutin heldur eisini, at arbeiðið hjá landsstýrinum eigur at fevna um møguligu loyvi at geva børnum í Føroyum altjóða nøvn, sum Harry og Henry og norðurlendsk nøvn sum Olaf og Svend. Hetta eru fornøvn, sum bóast alt hava verið loyvd fornøvn í Føroyum seinastu 100 árini.

Minnilutin (Lasse Klein, Ingeborg Vinther og Jógvan á Lakjuni) tekur undir við uppskoti Kristiliga Fólkaflokksins - Føroya Framburðs- og Fiskivinnufloks og mælir tinginum til at samtykkja tað.
2. viðgerð 10. mai 1996. Uppskot Kristiliga Fólkaflokksins - Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokks fall við 7-1-13 atkvøðum.

112 Miðvísur landbúnaðarpolitikkur í Føroyum - 5 - 10 ára ætlan í landbúnaðarøkinum

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Lasse Klein vegna Kristiliga fólkaflokkin, Føroyat frambuðs- og fiskivinnuflokk fram soljóðandi

U p p s k o t

til

samtyktar

Heitt verður á landsstýrið um at leggja lógaruppskot um vinnuligan landbúnaðarpolitikk fyri Føroyar fyri løgtingið í seinasta lagi 1. okt. 1996, sum umfata hesi øki:

I
a) mjólkarúrdrátur,
b) seyðakjøtframleiðslu
c) neytakjøtframleiðslu
d) eggjaframleiðslu,
e) úrdrátur úr ull.

II
f) stráfóðurframleiðslu til seyð og neyt,
g) grønmetisframleiðslu av fruktum, sum er egnaðar til framleiðslu í Føroyum.

III
h) at koma við uppskoti um aðrar møguleikar á landbúnaðarøkinum.

Viðmerkingar:

Fyri nøkrum árum síðani setti landsstýrið nevnd niður at viðgera vinnuligan landbúnað í Føroyum við tí fyri eyga at menna landbúnaðin sum heild, men lóast hetta rokist einki fyri, at hetta arbeiðið fer ein enda, og tað má metast óhóskandi fyri eitt so frankamið samfelag ikki at hava skipað viðurskiftir á hesum øki, serstakliga tá hugsað verður um, hvørji virði fara fyri skeyti orsakað av torvandi lóggávu á økinum, og tí mú tað metast rætt, at Føroya Løgting ásetir karmarnar fyri hesum arbeiði soleiðis, at vissa fæst fyri, nær arbeiðið gerst liðugt.

Tað er trupult at fáa eyga á ein miðvisan vel orðaðan landbúnaðarpolitikk í Føroyum, bíðast møguleikar eru til staðar á mongum økjum. Spurningurin er, um tað ikki er upp á hægsta tíð, at politiska myndugleikarnir og partarnir í landbúnaðinum finna fram til ein miðvísan landbúnaðarpolitikk, sum fevnir yvir eitt fimm og tíggju ára tíðarskeið.

Hvørji yvski og krøv krevja politiskir myndugleikar, hvat krevja partarnir í landbúnaðinum, og hvat krevur samfelagið verður gjørt á landbúnaðarøkinum?

Hvørjir møguleikar eru, og hvat kann gerast, og hvørjar fortreytir skulu verða til staðar fyri at náa úrslit og endamál á landbúnaðarøkinum?
Tað kann av røttum verða spurt, hví hava vit føroyska landbúnaðarframleiðslu, og hví hava vit føroyskan landbúnað? Hvør er meingin við hesum í dag, og hvør verður meingin við hesum í framtíðini?

Sambært tjóðarrokniskapin fyri 1988 er partur landbúnaðarins av bruttofaktorinntoku Føroya 65 mió. kr. ella 1,1%. Framleiðslan, sum liggur til grund aftan fyri hesa útrokning, er: mjólk, kjøt, egg, eplir og grønmeti

umframt stráfóður, men hóast hetta hava lønarútgjaldingarnar ikki verið stórar 4 mió. kr.

Flest allir partar eru samdir um, at bruttofaktorinntøkan kann økjast heilt munandi, umframmt at fleiri fólk aftrat kunnu fáa arbeiði í landbúnaðarvinnuni, um rætt verður atborið, og er hetta tí eisini orsøkin til hetta uppskotið. Í besum døgum, ar støðugt vaksandi arbeiðsloysi ger seg galdandi, kundi henda vinna í nógv størri mun skapt fortreytir bjá mangari familju fyri lønandi virksemi.

Eitt slíkt lógaruppskot kann føra við sær eina samlaða virðisøking í landbúnaðinum upp á uml. 85 mió. kr. árliga, tá framleiðslan er komin í hæddina. Ynskiligt er, at høvuðstættirnir í uppskotinum verða hesir:

MJÓLKARÚRDRÁTTIR

Samskipanin av mjólkarframleiðsluni í Føroyum hevur eydnast sera væl, og kann bygnaðurin sum slíkur brúkast sum fyrimynd fyri, hvussu fram skal farast, tá hugsa verður um aðrar møguleikar innan landbúnaðin.

Mjólkarframleiðslan er vaksin nógv upp á stutta tíð úr 3 mió. litur í 1981 upp í 5,45 litrar í 1989, ella ein vøkstur upp á 55% eftir bert 8 árum.

So gott sum øll mjólk, ið verður seld í Føroyum, verður seld um Mjólkarvirki Búnaðarmanna, ið hevur 95 aktivar lutaeigarar. Skal framleiðslan økjast ella standa í stað, so er eisini neyðugt at hugsa um aðrar møguleikar. Aðrir møguleikar eru í gongd t.d. jogurt, ostur og rómi. Men tað verðuur fram vegis innflutt drekkimjólk, umframt aðrir mjólkarúrdráttir, sum eins væl kundu verið framleiddir í Føroyum, og fyri 1992 hesir vøruhólkar:

Smør	207.421 kg	kr.	3.477.828
jogurt o.a.	171.972 kg	kr.	1.959.840
ostur	482.983 kg	kr.	11.154.529
drekkimjólk	1.008.121 kg	kr.	3.171.155
turrmjólk	56.501 kg	kr.	920.795
Samanlagt		kr.	20.684.147

SEYÐAKJØTSFRAMLEIÐSLA

Er leysliga ætlað út frá hagtølunum í Árbókunum fyri Føroyar: 70.000 áseyðir og 0,7 seyðir at drepa fyri hvønn áseyð. Um hvør dripin seyður vigar 12,5 kg, gevur tað 0,7 x 70.000 x 12,5 kg = 595 tons.

16.000 heimaær og 1,6 seyðir at drepa fyri hvørja heimaær. Um hvør dripin heimaseyður vigar 16 kg, gevur tað 1,6 x 16.400 x 16 kg = 419,8 tons.

Samlaða føroyska framleiðsla: 1.015 tons árliga.
Í 1992 innfluttu vit 549.100 kg av seyðakjøti til eitt samlað virði upp á 10,2 mió. kr.

Mett verður ikki, at trupulleikar standast av, at framleiðslan av føroyskum seyðakjøti verður økt við umleið 500 tonsum aftrat árliga, so at vit gerast sjálvbjargin á økinum.

NEYTAKJØTSFRAMLEIÐSLA

Framleiðslan av føroyskum neytakjøti í 1992 var upp á 109.225 kg, meðan vit í sama tíðarskeiði innflutu 992.000 kg av neytakjøti fyri eitt samlað virði upp á 12 mió. kr. Mótvegis mjólkarsøluni hevur gingist illa at selja føroyska neytakjøtið fyri lønandi prís, og er orsøkin m.a. eisini bíligt innflutt kjøt úr ES.

Framleiðslan av føroyskum neytakjøti kann økjast munandi uttan trupulleikar, og tí eigur at verða gjørd ein serstøk skipan á økinum, sum ger okkum førar fyri at økja framleiðsluna upp til 50% av nýtsluni ár 2001, og eina ætlan fyri, hvussu vit gerast sjálvbjargin á økinum ár 2006.

EPLAVELTING

Epli vaksa væl í Føroyum, men trupulleikin er at fáa raksturin at bera seg, serstakliga um talan verðuur um vinnuligt endamál. Men lítil ivi tykist vera um, at royndarbrúk eiga at verða skipað. Eplainnflutningur í tonsum hevur verið hesin:

	1990	1991	1992

Setepli	53,3	120,7	76,6	
epli	2.481,3	2.446,3	3.038,6	2.655 t.
annað	46,7	18,3	114,6	
samanlagt	2.581,3	2.584,3	3.229,4	2.799 t.

Tað eru nógv viðurskifti, sum ávirka, hvussu nógv epli fáast úr hvørjum veltum hektara av eplavellu, og fyri at meta leysliga um, hvussu nógv epli fáast til sølu úr einum ha. kann verða hugt at okkara grannum:

Yvirlit yvir eplaúrtøku pr. ha (tons)

Út frá hesum kann ætlast, at í Føroyum fáast møguliga 30 tons at selja úr hvørjum hektara, og fyri at fáa 2.655 tons krevst, at minst 2.655/30 = 88,5 hektarar verða veltir til eplir. Tá skulu helst ganga nøkur ár millum, at epli verða sett niður í sama stykkið, so krevst at ikki minni enn 3 - 5 x 88,5 ha = 265,5 - 442,5 ha eru, sum kunnu brúkast til eplavelting.

GRØNMETISVELTING

Nógv grønmeti verður keypt til landið, sum eins væl kundi verið vell her á landi, t.d. hesi fyri 1992:

Hvíttkál-reyttkál	121.676 kg	kr. 402.000
leykir	176.149 kg	kr. 698.000
salat/kál	22.581 kg	kr. 246.000
gularøtur	273.441 kg	kr. 1.093.000
		kr. 2.439.000
Umfram:		
agurkur	86.560 kg	kr. 910.000
fryst grønmeti	211.444 kg	kr. 1.863.000
tomatir	107.051 kg	kr. 1.256.000
purrur, blómkál	72.382 kg	kr. 586.000
Samanlagt		kr. 7.054.000

Ein hektar av landbúnaðarjørð kann framleiða umleið 35 tons av gularøtum, ella 10-20 tons av káli. Tað vil siga, at skulu einar 30-40 ha av landbúnaðarjørð til fyri at velta mesta partin av fyrr nevndu vøkstrum. Verður fyrivarni tikið fyri skift av vøkstri, so skulu eitir 150 ha av góðari landbúnaðarjørð til, og fyri at loyggja vakstrartíðina, er neyðugt at lata vaktrarhús taka sær av at fáa vøkstirnar at nala, so at heystast kann tíðliga á árinum. Tað er ongokk eingin trupulleiki at skipa fyri hesum, bert skulu vakstrarhúsini hava tað at vita í rímiligari góðari tíð.

NIÐURSTØÐA

Tá ið lógaruppskot frá landsstýrinum fyriliggur verður neyðugt at taka aðrar týðandi spurningar í sambandi við landbúnaðarviðurskifti upp, m.a. um lóggávuna, ílógur, fígging, skuld, skattaviðurskifti, umhvørvi, garðarnar og festini, viðurskiftini hjá unsitingarligu myndugleikunum, tenastur og slátnarvirkir.

Í longri tíð hevur landbúnaðarvinnan havt eitt objektivt og gott orðaskifti um neyðugar broytingar, og ætlanin er, at hetta uppskotið skal vera ein liðil, men týðningarmikil partur av menningini og landbúnaðarviðurskiftunum í Føroyum.

Tað er eisini neyðugt, um sámiligt lív skal verða lagað fyri landbúnaðin í Føroyum í framtíðini, at allir partar, sum varða av vinnuni, seta seg saman og samráðast um eina mansonniliga loysn fyri framtíðina hjá landbúnaðinum sum heild.
Tað má førast ein landbúnaðarpolitikkur, sum studlar mest møguligari framleiðslu av landbúnaðarvørum. Eitt nú neyta- og seyðakjøt, eplir, grønmeti, úrdráttir úr ull v.m., og tað má førast ein strangur ílogupolitikkur, sum fremur best møguligan gróðrarbotn fyri ta framleiðslu, sum skal framleiðust her á landi.

Tað er eisini neyðugt at skipa fyri strangari góðskumetan og sølupolitikki, soleiðis at foroyskar landbún-

aðarvørur verða keyptar fram um aðrar, og neyvan nakrantíð hevur tað verið meira neydugt at standa saman um landbúnaðarvinnuna enn júst í hesum tíðum.

1. viðgerð 19. apríl 1996. Málið varð beint í vinnunevndina, sum 2. mai 1996 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum - Føroya Frambúrðs- og Fiskivinnuflokki tann 25. mars 1996 og eftir 1. viðgerð 19. apríl 1996 beint í vinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og tekur undir við uppskotinum við hesum viðmerkingum.

Uppskotið lýsir rætuliga vel partar av landbúnaðinum, og er nevndin samd um, at í hvussu so er eigur viðgerð landsstýrisins at fevna um teir trýggjar partarnar, sum uppskotsstillarin vísir á í uppskotinum, og við tað at vandi kann verða fyri, at hetta arbeiði dregur út, er nevndin samd um, at heita á landsstýrið um at roiða fram í móti at fáa hetta arbeiði tiðugt 1. oktober 1996, soleiðis at tingið kann fáa eitt aðalorðaskifti um hesar spurningar so skjótt arbeiðið er liðugt.

Nevndin leggur dent á, at tað í framtíðini í størri mun fer at bera til at fáa ein vel orðaðan landbúnaðarpolitikk í Føroyum, soleiðis at eingi virði fara fyri skeyti ørsakað av tørvandi lóggávu á økinum, og leggur nevndin stóran dent á at fáa lýst hvørjir møguleikar eru, og hvat kann gerast, og hvørjar fortreytir skulu verða til staðar fyri at náa úrslit og endamál á landbúnaðarøkinum.

2. viðgerð 8. mai 1996. Uppskotið til samtyktar varð endaliga samtykt við 25-1-0 atkvøðum.

113 Broyting í løgtingslóg um tær kommunalu fíggjarætlanirnar, ásetan av komunuskattaprosentinum, kommunalan kreppulánsgrunn v.m.

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Jákup Olsen, løgtingsmaður, vegna Kristiliga Fólkaflokkin - Føroya Frambúrðs- og Fiskivinnuflokk fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tær kommunalu fíggjarætlanirnar, ásetan av kommunuskattaprosentinum, kommunalan kreppulánsgrunn v.m.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 189 frá 8. december 1993 um tær kommunalu fíggjarætlanirnar, ásetan av komunuskattaprosentinum, kommunalan kreppulánsgrunn v.m., við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1, stk. 4 verður "23" broytt til: "14" og "16" broytt til "10".
2) Í "6" verður "16" broytt til "10".

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1997.

Viðmerkingar:

LÆKKING AV KOMMUNUSKATTAPROSENTINUM

Støðan hjá kommununum er framvegis óbroytt, eingin avtala er fingin við lángevarar. Hetta ber í sær, at kommununnar framvegis hava ov høgt kommunuskattaprosent. Tí má landsstýrið skunda undir soleiðis, at ein avtala kann fáast sum skjótast. Harnæst er neyðugt at líta framt nýtt býti millum land og kommunur soleiðis, at kommununnar framyvir koma at hava eitt skattaprosent, sum í hægsta lagi er 14%.

Kommunuskatturin er ein av høvuðstrupulleikunum í persónskattinum hjá fólki, og er hann alt ov høgur og eigur tí at lækka munandi. Orsøkin er fyrst og fremmst kommunuskuldin, sum er alt ov stór, og tí er neyðugt at staðfesta, at tað er ein almenn landsstýrisuppgáva at bjarga og hjálpa kommununum burtur úr trupulleikanum.

Rakstur, fløgur og avdráttir skulu liggja innanfyri 14%, og alt tað, sum liggur millum 14% og 23%, sum støðan er í dag, skal viðgerast á serligan hátt, og annaðhvørt afturgjaldast eftir serligari skipan ella avskrivast.

Annars verður víst til viðmerkingarnar í løgtingsmáli nr. 109/1995.

Í fyrstu syftu kosta uppskotini (løgtingsmálini 109/1995 og 113/1995) landskassanum og kommununum pening, men uppskotini hava eisini tí endamáls at koma svarta arbeiðinum til lívs, og mett verður, at uppskotini fara at føra við sær, at nógv fleiri upphæddir koma til skattingar enn bigartil, og harvið økjast inntøkurnar hjá almennum kassunum.

Metast kann, at útreiðslurnar av uppskotinum verða besar:

Landskassin	43 mió. kr.
Kommununnar	40 mió. kr.
falt	83 mió. kr.

Orsakað av tilløkunum má roknast við, at útreiðslurnar fyri almennu kassarnar verður nógv minni. Fyribilstølini benda á, at kostnaðurin kemur heilt niður á 35 mió. kr. fyri landskassan og kommunukassarnar.

Men av tí at uppskotini ikki skulu koma í gildi fyr enn næsta ár, eru møguleikar at taka hædd fyri møguligum broytingum í kostnaðinum. Men mett verður, at tað hevur fyrimun longu nú at fráboða eina gildiskomu fyri næsta ár, soleiðis, at skattaborgarar landsins kunnu fyrireika seg upp á møguligar broytingar í skattskyldugu inntøku sínari í góðari tíð.

1. viðgerð 11. apríl 1996. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 7. mei 1996 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av Kristiliga Fólkaflokkinum, Føroya framburðs- og Fiskivinnuflokki hin 25. mars 1996 og varð eftir 1. viðgerð 11. apríl 1996 heint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og ein samd nevnd tekur ikki undir við uppskotinum.

Í sambandi við viðgerðina av málinum, ynskti nevndin at fáa mett um upphæddirnar, ið uppskotsstillarin hevur sett í lógaruppskotið, nevniliga útreiðslurnar fyri landskassan og kommununnar. Í uppskotinum verður mett, at útreiðslurnar av uppskotinum verða 43 mió. kr. fyri landskassan, 40 mió. kr. fyri kommununnar, tils. 83 mió. kr.

Toll- og Skattstova Føroya hevur gjørt útrokningar grundaðar á, at skattaprosentið er 14 í øllum kommununum. - útrokningarnar eru gjørdar við grundarlagi í 1995, sjálvt um allar sjálvuppgávurnar enn ikki eru komnar inn.
Útrokningarnar hjá Toll- og Skattstovuni vísa, at útreiðslurnar av uppskotinum fyri landskassan verða 10,3 mió. kr. 197,9 mió. kr. fyri kommununnar, tils. 208,4 mió. kr.

2. viðgerð 9. mei 1996. Uppskotið fall við 1.5-22 atkvøðum.

114 Framtíðarstøða Føroya

Ár 1996, mánadagin 25. mars legði Finnbogi Ísakson, løgtingsmaður vegna tjóðveldisflokkin fram soljóðandi

UPSKOT

til

samtyktar.

Løgtingið samtykkir at fremja hesi tiltøk beinanvegin:

1) Sett verður nevnd at gera uppskot til grundlóg fyri Føroyar. Uppskotið verður lagt fyri Løgtingið, sum so leggur tað út til fólkaatkvøðu til góðkenningar.
2) Føroysk uttanríkistænasta verður skipað.
3) Ein føroyskur yvirrættur verður stovnaður. Skipan um tilnevning av dómarum verður gjørd soleiðis, at dómarar og fulltrúar hjá sorinskrivaranum og í yvirrættinum eru óheftir av Landsstýri og Løgtingi.
4) Ákæruvald, løgregla, fongsulsverk og kriminalforsorg verða skipað sum stovnar undir Landsstýrinum.
5) Loftferðsla, radiosamband, vitaverk, skipaeftirlit, umsitingin av persóns-, familju- og arvarættarligum málum verða skipað undir Landsstýrinum.
6) Føroysk lóggáva verður gjørd fyri ikki yvirtikin sermál og núverandi felagsmál.
7) Samráðingar verða við donsku stjórnina og/ella aðrar stjórnir um samvinnu í uttanríkis-, sjúkrahús- og útbúgvingarmálum.

Viðmerkingar:

Gongdin í Føroyum hesi seinastu árini hevur til fulnar víst, at neyðugt er at gera týðandi broytingar í teimum statsrættarligu viðurskiftunum, um føroyingum skal tryggjast manssømilig kor í framtíðini.

Undir Heimastýrisskipanini, sum kom í gildi 1. apríl 1948, hava føroyingar partvíst havt sjálvstýri, men ógreitt hevur verið við ábyrgdini, um og nær hon lá hjá føroyskum og donskum myndugleikum. Henda statsrættarliga fløkja er høvuðsatvoldin til tær mongu skeivu avgerðir, sum vórðu tiknar í Føroyum og Danmark viðvíkjandi føroyska samfelagnum, og sum endaðu við teirri vanlukku, sum rakti føroyska fólkið í oktober 1992 og árini eftir.

Stórar avbjóðingar standa fyri framman: samfelagið verður endurskipað sum heild, og møguliga - ella eftir øllum at døma - fer ein oljuvinna at taka seg upp. Í hesi endur- og nýskipanartíð hevur tað avgerandi týdning, at føroyingar hava fult ræði á øllum landsins viðurskiftum og samstundis alla ábyrgd av sær sjálvum, sínum landi og tí, sum hartil hoyrir. Bert um fult ræði og full ábyrgd fylgjast verður samfelagið endur- og nýskipað út frá føroyskum fyritreytum og við vælgrundaðum avgerðum.

Eftir hesum uppskoti verða tey statsrættarligu viðurskiftini broytt samsvarandi tí, ið ført er fram omanfyri. Víst verður annars til "Álit um stýrisskipanarviðurskifti Føroya" frá 1993, síðurnar 202-205.

Føroyingar eru fáment tjóð. Møguleikar verða valla fult út at røkja allar tær uppgávur, sum størri tjóðir kunna røkja. Her er ma. talan um uttanríkis-, sjúkrahús- og útbúgvingarmál. Undugsast má eisini, um hjálp eigur at verða fingin uttaneftir at viðgera serstøk rættarmál.
Neyðugt verður tí at samráðast við donsku stjórnina og/ella aðrar stjórnir um framhaldandi samvinnu á hesum økjum.

Hetta uppskot umfatar einans tær statsrættarligu broytingar, ið skula gerast. Samráðingar mugu vera við donsku stjórnina um tey fíggjarligu og búskaparligu viðurskiftini, og hvussu gerast skal upp landanna millum á hesum øki.
Nevndin, ið skal gera grundlógaruppskot, er løgtingsnevnd, samtbært § 27 í tingskipan Føroya løgtings. Viðmerkjast skal, at punktini 2) - 7) eru avleiðingar av pkt. 1).

1. viðgerð 19. apríl 1996. Málið varð beint í rettarnevndina, sum 8. mai 1996 legði fram soljóðandi

Á l i t

Málið er lagt fram av tjóðveldisflokkinum tann 25. mars 1996 og varð eftir 1. viðgerð tann 19. apríl 1996 beint í rettarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meirluta og 2 minnilutar.

Signar á Brúnni, Ingeborg Vinther, Jógvan á Lakjuni og Lasse Klein taka undir við uppskot tjóðveldisfloksins og mæla tinginum til at samtykkja uppskotið við einum nýggjum uppískoyti. pkt. 8. um tey fíggjarligu viðurskiftini millum Føroyar og Danmark og verður broytingaruppskot sett fram til uppskot tjóðveldisfloksins.

Jógvan á Lakjuni førir fram, at tað avgjørt er neyðugt at broyta viðurskiftini Føroya og Danmarkarímillum. Í eingin ivi er um, at okkara ríkisrettarliga støða hevur verið ein stór orsøk til ta støðu, sum vit sum tjóð eru endað í. Føroyingar eiga sjálvir at taka fulla ábyrgd av sínum egna landi - bæði politiskt og fíggjarliga.

Uppskot tjóðveldisfloksins er íløkiligt á tí statsrettarliga økinum, men her vantar tann fíggjarligi partarin, og tí er helvtin av tí, sum skal til, ikki við í uppskotinum. Tað politiska frælsið og tað fíggjarliga frælsið kunnu ikki isolerast hvørt frá øðrum, og tí er týdningarmikið, at hetta verður tikið við í uppskotið til samtyktar.

Fólkaflokkurin heldur, at tað er alneyðugt, at vit - samstundis sum vit fyrireika okkum til politiskt frælsi fáa gjørt upp í sambandi við okkara stóru uttanlandsskuld. Í uttan eitt fíggjarligt frælsi verður ómetaliga torført at fáa ein politiskt frælsi.

Lasse Klein hevur hesar viðmerkingar: Tikið verður undir við uppskoti tjóðveldisfloksins og víst verður til stevnuskránna hjá kristiliga fólkaflokkinum. Føroya framburðs- og fiskivinnuflokki um. at vit "*við støði í tí kristnu lívs- og menniskjaðskoðanini taka fulla ábyrgd av landsins stýri*".

Tað er í hesum sambandi náttúrligt, at samráðingarnar verða tiknar upp við danir um framhaldandi samvinnu á nógvum økjum, sum vit í dag vita lítið um og ikki megna einsamallir, men ábyrgdin fyri føroyskum viðurskiftum skal alla tíðina liggja hjá føroyingum sjálvum.

Gjørt verður vart við, at við føroyska sjóøkinum í buga eru Føroyar ikki nakað lítið land. Tátan er um so stórt náttúrurikidømi og so nógvar møguleikar innan fiskivinnu, oljuvinnu, fíggjar- og samskiftsvinnu v.m., at tað áleggur okkum størri skyldur at ansa eftir, at betta kemur øllum til góðar, at gávurnar verða umsitnar við ábyrgd fyri skaparanum, okkum sjálvum og næsta okkara, eftirkomarum, ja mannaætlini allari.

Vit eiga at læra av teimum rentbingum, sum skakað hava alt tað føroyska samfelagið seinastu árini, og mugu vit seta út í kortið av nýggjum. Tað er neyðugt við orðaskifti um framtíðarstøðuna, hvat ið miðað eigur at verða fríði. Tí er uppskot tjóðveldisfloksins framstig, sum allir flokkar á tingi eiga at taka undir við.

Tað er neyðugt við breiðum politiskum samarbeði, og í besi lagnutíð fyri føroysku tjóðina er vert hjá okkum at minnast aftur á stevnumið hjá tjóðskaparrørsluni, ið fólkið tók undir við, og støðuna undir politiska flokksbýtinum í 1906. Tá stóðu ávísir menn saman um at fáa dimmið at lætta í Føroyum fyri at vinna føroyskum máli rettindi í egnum landi, menna samskiftismøguleikarnar á sjógvi og landi, økja um vinnumøguleikarnar og siðmenningarliga tilvitið á kristnari grund.

Niðurstøðan er tí hendan: at nú er stundin komin at gera upp og rógva aftur á aftur og seta sær nýggj mál, tjóðini og mannaætlini allari af gagni, so at nakað gott spyrst burtur úr kreppuni, ið rakt hevur alt tað føroyska samfelagið og gjørt lívið tyngri her á yggjunum á so nógvan hátt, og mæli til at samtykkja uppskot tjóðveldisfloksins.

Signar á Brúnni, Ingeborg Vinther, Jógvan á Lakjuni og Lasse Klein seta fram soljóðandi

broytingaruppskot

til

uppskot til samtyktar

Sum punkt 8 verður sett: "Samráðlingar verða við ta dousku stjórnina um at fáa gjørt upp í teinum fíggjarligu viðurskiftunum Føroya og Danmarkar ímillum".

Marita Petersen er samd við uppskotsstillaranum um, at neyðugt er at gera broytingar í statsrettarligu viðurskiftum Føroya.

At breið politisk semja tykist vera fyri broytingum á hesum øki, er nýggja stýrisskipanin besta dømi um og týdningarmesta orsøkin til, at so væl hevur gingið við hesum máli hetta stutta tíðarskeið, er, at broytingarnar hava fingið breiða politiska undirtøku.

Men nýggja stýrisskipanin var bert fyrsta stigið á leiðini at gera nýggja sjálvstýrislóg, sum skal avloysa heimastýrislógina, ella rettari: er neyðuga grundartagið fyri eini sjálvstýrislóg.

Nýggja stýrisskipanin kemur í fullum líki í gildi á ólavsøku í ár, og tíðin er nú komin til at halda fram í arbeiðnum at fyrireika broytingr í statsrættarligu støðu Føroya, og í hesum arbeiði er bæði rætt og neyðugt, at løgtingið hevur virknan leiklut.

Hóast tikið verður undir við teimum tankum, sum eru í uppskoti tjóðveldisflokksins, er tó ivasamt, um ein samtykt av uppskotinum í verandi líki fer at fremja málið, men kanska heldur kann verða orsøk til, at einki hendir.

Einki verður sagt um, hvør hevur ábyrgdina um uppskotið verður samtykt og um hvør skal seta allar tær nógvu samtyktirnar í verk. Skal landsstýrið, løgtingið ella onkur annar myndugleiki gera hetta?

Greitt er, at fleiri av teimum uppgávum, sum uppskotið fevnir um, eiga landsstýrið og landsumsitingin at taka sær av, men fer hetta uppskot soanu lagnu sum út við 95% av teimum "uppskotunum til samtyktar", løgtingið hevur samtykt, so fer als einki at henda.

Fleiri av tiltøkunum, sum skotin verða upp at seta í verk, eru prinsipiell og av stórum politiskum týdningi, og tí eiga hesir spurningar at fáa dygga politiska viðgerð. Allir flokkar eiga at hava møguleika at vera við í hesum arbeiði frá byrjan av, at vera við til at orða arbeiðssetningin, at gera uppskot til hvør skal gera arbeiðið, at gera uppskot til hvussu farast skal fram, at áseta hvussu langa tíð arbeiðið skal taka, og annars at taka støðu til onnur viðurskifti í sambond við hetta mál.

Hesin framferðarhátur fer kanska at taka eitt sindur longri tíð, enn uppskotsstillararnir kundu hugsað sær, men tá her ræðir um grundleggjandi broyting fyri føroysku tjóðina, má neyðuga tíðin nýtast.
Umhugsað er, á hvønn hátt hetta kann skipast og er komið til ta niðurstøðu, at løgtingið eigur at seta nevnd við umboum úr øllum flokkum at fyrireika setan av stjórnmálanevnd at gera uppskot til broytingar í statsrettarligu viðurskiftum Føroya.

Eftir at hava kannað tingskipanina, verður hildið, at rettast er at seta nevnd sumb. grein 27 at gera tað fyrireikandi arbeiðið, og verður sett fram soljóðandi

broytingarupptskot

til

uppskotið til samtyktar

Løgtingið samtykkir at seta nevnd sambært grein 27 í Tingskipan Føroya Løgtings at fyrireika viðgerð av statsrættarligu støðu Føroya. Í nevndina verður valt eitt umboð fyri hvørm flokk á tingi.

- Nevndin skal viðgera spurningin um, á hvørjan hátt farast skal fram í sambandi við setan av eini stjórnmálanevnd.
- Nevndin skal orða arbeiðssetningin hjá stjórnmálanevndini og skal í hesum sambandi taka við til umhugsanar punktini í uppskoti tjóðveldisfloksins umfram onnur viðurskifti, sum nevndin metir av týðningi.
- Nevndin skal gera uppskot til, hvussu stjórnmálanevndin skal nummast, og ásetu, hvussu long tíð skal nýtast til arbeiðið.
- Nevndin skal harafturat koma við tilmæli um onnur viðurskifti av týðningi í sambandi við hetta arbeiði.

Nevndin skal, áðrenn tingsetan endar, lata formansskapi løgtingsins frágreiðing um arbeiði hjá nevndini.

Bjørn á Heygum og Sune Jacobsen taka ikki undir við uppskotinum og seta einki uppskot fram.

2. viðgerð 13. mai 1996. Eftir uppskoti frá Bjørn á Heygum varð við 15-2-14 atkvøðum samtykt, at beina málið aftur í rættarnevndina.

115 Løgtingslóg um sjónvarp

Ár 1996, týsdagin 30. apríl legði Signar á Brúnni vegna seg sjálvan og 16 tingfólk (Jógvan Adolf Johannessen, Jenis av Rana, Marita Petersen, Jógvan á Lakjuni, Bjarni Djurholm, Lisbeth L. Petersen, Henrik Old, Atli Hansen, Jógvan Durhuus, Finnbogi Ísaksen, Lasse Klein, Jørgen Niclasen, Óli Breckmann, Bjørn á Heygum, Jógvan I. Olsen og Sverre Miðjordi) fram soljóðandi

U p p s k o t

til

<u>løgtingslóg</u> um sjónvarp

§ 1. Landið hevur einkarrætt til sjónvarpssendingar.
2. stk. Gjørt verður sendinet og sjónvarpsstøva. Landsstýrinum verður heimilað at taka tørvandi lán til tess.
3. stk. Stovnurin verður nevndur: Sjónvarp Føroya.
4. stk. Sjónvarp Føroya hevur til endamáls at hava objektivan, sakligan og upplýsandi tíðindaflutning og sendingar annars, ið varðveita og fjálga um føroyska mentan, átrúnað og siðlæru.
§ 2. Eftir tilmæli frá sjónvarpsnevndini setir landsstýrið í starv ella loystir úr starvi fyristoðumann, ið hevur dagliga leiðslu sjónvarpsins um hendi eftir reglugerð, ið landsstýrið fyrisetur.
2. stk. Landsstýrið setir starvsfólk sjónvarpsins eftir tilmæli fyristoðumansins. Lønir hjá fyristoðumanni og starvsfólki verða ásettar av landsstýrinum.

§ 3. Telefonverk Føroya Løgtings hevur sendinetið um hendi.
2. stk. Nýbygging verður fyriskipað av lands-

stýrinum og goldin av landskassanum. Raksturin verður borin av sjónvarpinum.

§ 4. Til sjónvarpið skal gjald rindast av hvørjum sjónvarpsmóttakara í landinum og umboðnum á skipum, ið eru skrásett í Føroyum.
2. stk. Landsstýrið fyrisetir gjaldið fyri eitt ár í senn.
3. stk. Eingin má seta sjónvarpsmóttakara til, fyrr enn hann er fráboðaður Sjónvarpi Føroya og gjaldið goldið. Sjónvarpsmóttakari, sum ikki er fráboðaður, kann koma undir konfiskatión og verður seldur til frama fyri sjónvarpið.
4. stk. Landsstýrinum er heimilað at fyriseta gjøllari reglur um gjaldskyldu og innheinting av gjøldum, innsigling av móttakarum fyri eftirstøður og panting.
5. stk. Landsstýrið kann treyta teimum, ið selja ella leiga sjónvarpsmóttakara, at uppgeva, hvørjum teir selja ella leiga sjónvarpsmóttakara.
6. stk. Eigari av sjónvarpsmóttakara, sum selir ella á annan hátt letur hann av hendi, skal samstundis boða sjónvarpinum frá og uppgeva navn keyparans ella móttakarans og bústað teirra.
7. stk. Skiftir eigari bústað, skal hann samstundis boða sjónvarpinum frá.
8. stk. Í serstøkum førum kann landsstýrið gera undantak frá at lata gjald.

§ 5. Fyristøðumaðurin ger uppskot til góðkenningar til fíggjarætlan fyri fíggjarárið og sendir landsstýrinum uppskotið.
2. stk. Inntøkur sjónvarpsins verða bert at nýta til sjónvarpsendamál.

§ 6. Fyri sjónvarpið verður lóg nr. 11 frá 14. februar 1957 um útvarpsnevnd, sum hon er og verður broytt at galda tilsvarandi, eins og reglugerð um starv útvarpsnevndarinnar. Formaðurin í útvarpsnevndini er eisini formaður í sjónvarpsnevndini, hinir limirnir í útvarpsnevndini kunnu ikki samstundis verða limir í sjónvarpsnevndini.

§ 7. Sjónvarpið hevur sama rætt sum telefonverkið at leggja tørvandi leidningar í jørð og til bygningar. Ongum er heimilað at leggja nýggjar leidningar, so teir nerva leidningar sjónvarpsins ella tól, sum standa í samband við teir.
2. stk. Landsstýrið avger stríð um tílík mál.

§ 8. Hevur persónur ella kommuna elleidningar ella tól, sum skapa trupulleikar fyri nýtslu sjónvarpsins, er sjónvarpinum heimilað fyri rokning eigarans at gera tørvandi fyriskipanir at byrgja fyri tílíkum.
2. stk. Tað er loyvt eftirliti sjónvarpsins í eftirlitsørindum at fara um annan mans grund og inn í hús, men má tá sigast frá frammanundan.
3. stk. Kunngerð viðvíkjandi útvarpsóljóði verður eisini at galda fyri sjónvarpið. Somuleiðis verður eftirlit útvarpsins eisini at umfata sjónvarpið.

§ 9. Í kirkjur, sjónleikarhús, samkomuhús, skúlar, veitingarhús og rúm, sum annars verða nýtt til almennar skemtanar ella fundir, skal sjónvarpinum verða heimilað uttan endurgjald at leggja tørvandi leidningar í sjónvarpsendamáli.
2. stk. Heimilað er sjónvarpinum at sleppa at upptaka og varpa út uttan endurgjald, tó eftir loyvi leiðslunnar:
a) gudstænastur og fyrilestrar, sum tað almenna stílar fyri ella gevur studning til,
b) almennar fundir.

§ 10. Felagsantennuútbúnaður og annar kaðalútbúnaður ætlaður at veita sjónvarpssendingar til privatar íbúðir eru bert loyvdar at endurgeva sendingar frá Sjónvarpi Føroya og beinleiðis móttiknar sendingar úr útlondum.
2. stk. Sendingarnar verða at endurgeva óbroyttar og samstundis við, at tær verða útvarpaðar.
3. stk. Landsstýrinum er heimilað at gera frávik frá regluni í 1. stk.

§ 11. Brot móti hesi lóg koma undir sekt. Málini verða framd sum løgreglumál, tó so at reglurnar í rættargangslógini deild 68 og 69 verða tilsvarandi nýttar sum í málum, statsadvokaturin fremur.
2. stk. Landsstýrinum verður heimilað at royna at fremja mál um brot móti lógarinnar § 4 sum fyrisitingarmál.

§ 12. (avtikin).

§ 13. Henda lóg kemur í gildi 1. mai 1996 og er galdandi til 31. oktober 1996.

Viðmerkingar:

Galdandi lóg, sum er løgtingslóg nr. 77 frá 21. mai 1982 um sjónvarp við seinri broytingum fer sbrt. løgtingslóg nr. 24 frá 25. mars 1996 úr gildi fann 1. mai 1996.

Av tí at nýggj lóg um sjónvarp ikki verður sett í gildi áðrenn 1. mai 1996, er neyðugt at núgaldandi lóg eisini verður í gildi aftan á 1. mai 1996.
Orsakað av tí statta skotbrá, sum er, og vísandi til tíðarfreistirnar í tingskipanini, ber ikki til bert at fram

leingja verandi lóg. Í staðin verður tí galdandi lóg lógd fram av nýggjum.

Viðvíkjandi viðmerkingunum annars verður víst til viðmerkingarnar til galdandi lóg.

1. viðgerð 2. mai 1996. Málið varð beint beinleiðis til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 7. mai 1996. Samtykt við 23-0-0 atkvøðum at beina málið til 3. viðgerð.

3. viðgerð 14. mai 1996. Málið endaliga samtykt við 29-0-0 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 65, 20. mai 1996.

116 Løgtingslóg um útvarpsnevnd

Ár 1996, týsdagin 30. apríl legði Signar á Brúnni vegna seg sjálvan og 16 tingfólk (Bjørn á Hevgum, Jógvan I. Olsen, Jógvan Adolf Johannessen, Sverre Midjord, Jenis av Rana, Marita Petersen, Jógvan á Lakjuni, Bjarni Djurholm, Lisbeth L. Petersen, Atli Hansen, Óli Breckmann, Henrik Old, Jógvan Durhuus, Finnbogi Ísakson, Lasse Klein, Jørgen Niclasen) fram soljóðandi

U p p s k o t

til
<u>løgtingslóg um útvarpsnevnd.</u>

§ 1. Sett verður útvarpsnevnd við 5 limum. Landsstýrið velur hesar fyri 4 ár í senn. Landsstýrið uppnevnir formannin limanna millum. Landsstýrið kann tó eftir tilráðing frá lurtarafeløgum, sum frammanundan hava fingið góðkenda tilráðingarheimild frá landsstýrinum, nøra um nevndina við 1 limi.
Stk. 2. Samstundis verða eisini valdir 5 tiltakslimir og eftir tilráðing frá lurtarafeløgum við tilráðingarheimild velur landsstýrið tiltakslim fyri møguligan eykalim.

§ 2. Útvarpsnevndin tekur avgerð um, hvussu dagsskrá útvarpsins skal skipast í høvuðsevnum, og góðkennir hana, innan hon verður kunngjørd. Nevndin fyrisetir reglur, ið hon heldur vera neyðugar við tí endamáli, at tað, sum útvarpað verður, hevur fjølbroytt, mentunnarligt og upplýsandi innihald, og at hugsunarfrælsi, rættsinni og javnaður móti øllum flokkum og stevnum í almennum málum, vinhustevnum, feløgum og einstakum monnum skulu ráða í útvarpinum.
2. stk. Landsstýrið setir í reglugerð gjølligari skipanir um starv útvarpsnevndinannar. Limirnir fáa samsýning og ferðaútreiðslur goldnar eftir reglum, sum landsstýrið fyrisetir.
§ 3. Útvarpsnevndin kemur saman á fund regluliga eina ferð um mánaðin og annars so ofta, tørvur er á. Formaðurin boðar til fundar. Hann hevur skyldu at boða til eykafundar, tá fyristøðumaður útvarpsins ella tveir menn úr útvarpsnevndini krevja tað.
Stk. 2. Fundur er samtyktarførur, um meiriluti av limunum er á fundi.
Stk. 3. Útvarpsfyristøðumaðurin hevur sæti á fundum útvarpsnevndarinnar og hevur har rætt at fáa orðið og seta fram uppskot, men hevur ikki atkvøðurætt. Hann skal seta fram uppskot til dagsskrá, harundir uppskot til fyrilestrar og samtalur og musikk og sangútvarp.

§ 4. Útvarpsnevndin tekur ikki seinni enn 1. september avgerð um høvuðsevni fyri dagsskrá fyri oktober-mars og ikki seinni enn 1. mars viðvíkjandi dagsskrá fyri apríl-september.
Stk. 2. Dagsskrá skal til hvørja tíð verða samtykt í høvuðsdráttum fyri minst fýra vikur. Dagsskrá fyri hvørja viku verður útgivin ikki seinni enn friggjadag í vikuni undan og lýst í útvarpinum friggjadag undan.

§ 5. Um maður, ið flyta skal útvarpsevni, fær forfall, ella aðrar ófyrisæddar umstøður gera broytingar neyðugar av dagsskrá, skipar útvarps fyristøðumaðurin so vítt gjørligt í samráð við formannin fyri útvarpsnevndini fyri dagsskrá á besta hátt samsvarandi teimum høvuðslinjum, nevndin hevur samtykt.

§ 6. Limir nevndarinnar hava tagnarskyldu. Tá avgerð er tikin í einum máli, kann tað tó frítt verða ummælt.

Stk. 2. At enda á fundi í nevndini verður samtykt, hvørjar upplýsingar verða at senda blaðunum.

§ 7. Henda lóg kemur í gildi 1. mai 1996 og fer úr gildi 31. oktober 1996.

Viðmerkingar:

Galdandi lóg, sum er løgtingslóg nr. 11 frá 14. februar 1957 um útvarpsnevnd fer sbrt. løgtingslóg nr. 23 frá 25. mars 1996 úr gildi 1. mai 1996.

Av tí at nýggj lóg um útvarpsnevnd ikki verður sett í gildi áðrenn 1. mai 1996, er neyðugt at núgaldandi lóg eisini verður í gildi aftan á 1. mai 1996.

Orsakað av tí stutta skotbrá, sum er, og vísandi til tíðarfreistirnar í tingskipanini ber ikki til bert at framleiðingja verandi lóg. Í staðin verður galdandi lóg lagd fram av nýggjum.

Henda lóg er sbrt. løgtingslóg nr. 77 frá 21. mai 1982 um sjónvarp við seinni broytingum eisini galdandi fyri sjónvarpsnevndina.

Vísandi til løgtingslógina um útvarpsnevnd, § 1, um val av nevndarlimum verður mælt til, at nevndarval ikki fer fram av nýggjum, men at sumu limir hálda fram í nevndunum, til nýggju lógirnar koma í gildi.

1. viðgerð 2. mai 1996. Málið verð beint beinleiðis til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 7. mai 1996. Samtykt við 23-0-0 atkvøðum at beina málið til 3. viðgerð.

3. viðgerð 14. mai 1996. Málið endaligu samtykt við 29-0-0 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 66, 20. mai 1996.

117 Tingskipan Føroya Løgtings

Ár 1996, háslagin 9. mai legði Vilhelm Johannesen vegna sig sjálvan og 19 tingfólk (Finnbogi Ísakson, Sune Jacobsen, Anfinn Kallsberg, Helena Dam á Neystabø, Ingeborg Vinther, Tórður J. Nielsen, Lasse Klein, Henrik Old, Jógvan Adolf Johannessen, Kristian Magnussen, Óli Breckmann, Marita Petersen, Óli Jacobsen, John Petersen, Heini O. Heinesen, Jógvan Durhuus, Jákup Joensen, Lisbeth L. Petersen, Jógvan I. Olsen) fram soljóðandi

Í løgtingsmáli nr. 190/93: Løgtingsmál um stýrisskipan Føroya varð gjørd soljóðandi samtykt: "Løgtingið setir nevnd við sitandi formanni í tinginum og fyrverandi formonnum løgtingsins: Lasse Klein, Anfinn Kallsberg, Jákup Lindenskov, Hergeir Nielsen, Jógvan Sundstein, Agnar Nielsen og Hilmar Beck - at gera uppskot til broyting av tingskipanin løgtingsins soleiðis, at tingskipanin m.a. sumsvarar tí av løgtingjunum í juni 1994 í fyrsta umfari samtykta uppskoti til løgtingslóg um stýrisskipan Føroya. Álitið verður at leggja fyri løgtingið samstundis sum uppskotið um nýggja stýrisskipan kemur til viðgerðar á 2. sinni."

Løgtingsformaðurin legði tann 18. apríl 1995 soljóðandi uppskot til samtyktar: Løgtingið samtykkir tingskipanina, sum tilmælt er av nevndini av tingformanninum, ið nú er, og tingformonnunum, ið hava verið, í álitti um Tingskipan Føroya Løgtings dagfest 17. mars 1995, bls. 38-65. Eftir 1. viðgerð varð málið beint í serliga nevnd, við umboðum úr øllum flokkum.
Henda nevnd legði 30. mai 1995 fram álit, sum í niðurstøðu sínu sigur, at málið er so umfatandi, at ikki er gjørligt at geva tí eina nøktandi viðgerð í tí tíðarskeiði, nevndin hevur fingið at leggja fram álit í málinum.

Meirilutin í nevndini setti tí fram soljóðandi uppskot til samtyktar:

I Nevndin mælir til, at løgtingið samtykkir framlagda uppskot.

II Nevndin verður sitandi sum millumtinganevnd og leggur fyri tingið møguliga broyting í løgtingsmáli nr. 112/94 í komandi tingseti."

Uppskotið varð samtykt tann 31. mai 1995.

Við tað at millumtinganevndin datt burtur sbr. § 27 í tingskipanini, varð málið lagt fram av nýggjum tann 16. oktober 1995 við soljóðandi uppskoti til samtyktar:

"Løgtingið samtykkir at seta eina serliga nevnd við einum umboði úr hvørjum flokki at viðgera og koma við møguligum broytingum í tingskipan Føroya Løgtings."

Hetta uppskotið varð samtykt, og í nevndina vórðu valdi:
Vilhelm Johannesen
Finnbogi Ísakson
Sune Jacobsen
Anfinn Kallsberg
Ingeborg Vinther
Helena Dam á Neystabø
Lasse Klein
Tórður J. Niclasen
Nevndin skipaði seg við Vilhelm Johannesen sum formanni og Finnboga Ísaksyni sum næstformanni.

Nevndin hevur síðani gjøgnumgingið og viðgjørt tingskipan Føroya løgtings. Undir viðgerðini hevur nevndin samanhildið núgaldandi tingskipan við gomlu tingskipanina, eins og nevndin hevur nýtt danska og íslendska tingskipanirnar í arbeiði sínum.

Undir viðgerðini av § 52 í tingskipanini hevur nevndin havt fund við ríkisumboðsmannin Vibeke Larsen og landsstýrismannin Axel Nolsøe. Tað hevur sjálvsagt verið meiri orðaskifti um einstakar greinir í tingskipanini enn um aðrar, og nevnast kann at t.d. reglurnar, sum viðvíkja uppskoti til samtyktar, t.v.s. § 65, stk. 1, nr. 3, og § 56, stk. 1, nr. 6, hava fingið dugiva viðgerð, eins og reglurnar, sum viðvíkja tíðarfreistum, t.e. t.d. § 32 viðv. fráboðan til nevndarfund, §§ 45-50, sum viðvíkja freistunum til framlogu og viðgerð av løgtingsfógaruppskoti.

Niðanfyri koma 56 broytingaruppskot frá tingskipanarnevndini. Í summum tørum er talan um broytingaruppskot, sum ein sand nevnd setir fram. Í øðrum tørum snýr tað seg um broytingaruppskot frá meirilutanum í nevndini, frá 4 av 8 nevndarlimum og frá minnilutum. Fram gjøgnum alltíð verður gjørt vart við so hvørt, hvussu nógvir nevndarlimir, og hvørjir teir eru, sum standa aftanfyri broytingaruppskotini.

1) § 3, stk. 2, nr. 4, verður soljóðandi: "at tey valdu eru myndug, hava danskan <u>ríkisborgaraskap</u> og eru heimahoyrandi í Føroyum sbr. stýrisskipanarlógini § 3."

Viðmerking: Orðið "heimarætt" verður broytt til: "ríkisborgaraskap".

2) § 4 verður orðað soleiðis: "Tilmæli um góðkenning av valbrevunum og um góðkenning av valúrslitunum verða munnliga lagd fyri tingið. Tingið tekur tá avgerð bæði um góðkenning av valbrevunum og um góðkenning av valúrslitunum á sama fundi, sum uppskotini eru lagd fram. Atkvøði verður fyri og ímóti."
Viðmerking: Við hesum verður § 1, stk. 3, í Tingskipan Føroya Løgtings frá 6. september 1985 sett inn aftur í tingskipanina. Orsøkin til broytingina er, at nevndin heldur, at hetta orðing er greiðari.

3) § 6 verður orðað soleiðis: "Tá valbrov teirra valdu eru góðkend við afkvoðugreiðslu, eru tey formliga løgtingsmenn og hava allar fær heimildir og oll rættindi, sum stýrisskipannarlógin veitir teimum."

Viðmerking: Nevndin hevur bert orðað § 6 greiðari.

4) § 7 verður orðað soleiðis: "Ellisformaðurin krevur nú av hvørjum løgtingsmanni, at hann við trú og heiður skrivar undir váttan, hvørji álitsstørv, sum nevnd eru í stýrisskipannarlógini § 8, hann hevur, og at hann játtar, at hann leggur nú hesi álitsstørv frá sær."

Viðmerking: Orðið: "Fyribilsformaðurin" verður broytt til: "Ellisformaðurin", ti tað er orðingin í § 2.

5) § 8 verður orðað soleiðis: "Ellisformaðurin lýsir nú løgtingið at vera sett."

Viðmerking: Orðið: "Fyribilsformaðurin" verður broytt til: "Ellisformaðurin".

6) § 9, stk. 2 verður orðað soleiðis: "Løgtingsmaður hevur skyldu at taka við sum formaður, ella 1., 2. og 3. næstformaður, uttan so er, at tingið samtykkir at víkja frá hesi reglu."

Viðmerking: Nevndin hevur bert orðað § 9, stk. 2, øðrvísi, so at orðið løgtingsmaður verður sett í staðin fyri løgtingsmenn.

Ein samd nevnd mælir til frammmanfyri standandi broytingar í tingskipanini.

7) § 11 fær hetta orðaljóð:
§ 11, stk. 1. "Flokkarnir, sum umboðaðir eru á løgtingi uttan flokkurin løgtingsformaðurin er úr, tilnevna tingmann til 1. 2. og 3. næstformann.
Stk. 2. Valið fer fram eftir lutfalsvalhátti sbr. løgtingsvallógini.

Viðmerking: Orðini: "eftir floksstødd" í galdandi tingskipan verða strikað - eins og ásett verður at valið fer fram eftir lutfallsvalhátti.

Tordur Niclasen, Lasse Klein, Ingeborg Winther og Helena Dam á Neystabø mæla til frammanfyri nevndu broyting í tingskipanini.

Vilhelm Johannesen, Finnbogi Ísakson, Sune Jacobsen og Anfinn Kallsberg taka ikki undir við frammanfyri nevndu broyting.

8) Inngangurin til § 15, stk. 2 verður orðaður soleiðis: "Umframt viðger formansskapurin ítokilig mál, ið sbr. tingskipanini skulu leggjast fyri formansskapin, mál av grundregluligum týdningi og/ella stórum týdningi, og mál, sum annars skulu verða viðgjord eitt nú: .... " (Viðm. nr. 1, 2, 3 og 4 í § 15, stk. 2 eru óbroytt).

Viðmerking: Nevndin hevur bert orðað § 15, stk. 2 øðrvísi.

9) § 18, stk. 3 verður strikað.

Viðmerking: Broytingin hevur við sær, at løgtingsformaðurin kann luttaka í orðaskifti sum aðir tingmenn.

Nevndarlimirnir Vilhelm Johannesen, Finnbogi Ísakson, Helena Dam á Neystabø og Tordur Niclasen, taka undir við frammanfyri nevndu broyting.

10) Í § 18, stk. 3 verður sum nýtt 2. pkt. sett: "Reglurnar frammanfyri eru tó ikki galdandi tá talan er um fíggjarlógarviðgerð og aðalorðaskiftið.

Viðmerking: Løgtingsformaðurin skal vanliga ikki taka lut í orðaskiftinum uttan hann áðrenn orðaskiftið

er byrjað hevur latið sessin frá sær til ein av næstformonnunum. Broytingin ber tó í sær, at formaðurin kann luttaka í aðalorðaskiftininum og viðgerðini av fíggjarlógini tá tað er sannlikt at hesi orðaskifti ganga yvir eitt longri tíðarskeið møguliga yvir fleiri dagar.

Nevndarlimirnir Anfinn Kallsberg, Sune Jacobsen og Lasse Klein mæla til frammanfyri nevndu broyting.

11) Sum nýggj § 23, stk. 1, nr. 9 verður sett: "Hann er løgfrøðiligur ráðgevi hjá flokkunum og tingmonnum.

Viðmerking: Broytingin merkir, at Løgtingsskrivstovan skal veita tingmonnum og flokkum løgfrøðiliga ráðgeving, men merkir ikki, at Løgtingsskrivstovan hevur skyldu, at gera størri lógarverk fyri tingmenn ella flokkar.

Ein samd tingskipanarnevnd mælir til frammanfyri nevndu broyting.

12) § 24. Tá ið løgtingsformaður er valdur, setir hann á dagsskrá til næsta løgtingsfund tey nevndarval, sum umrødd eru í § 25. Nevndirnar verða tá valdar hvør sær eftir lutfalsvalháttinum smb. løglingsvallógini.

Nevndarlimirnir Vilhelm Johannesen, Finnbogi Ísakson mæla til frammanfyri nevndu broyting.

Nevndarlimirnir Anfinn Kallsberg, Sune Jacobsen, Tordur Niclasen og Lasse Klein, taka ikki undir við frammanfyri standandi broyting, tí undin í tingskipanini er at samsvar skal verða millum samansetingina í nevndunum og í tinginum.

13) § 25. Á hesum fundi verða hesar nevndir valdar:
1) Fíggjarnevnd við 7 limum og 7 varalimum. Hon røkir sítt starv smb. § 44, stk. 2 í stýrisskipanarlógini og gevur annars løgtinginum tilmæli í fíggjar-, búskpar- skatta- og avgjaldsmálum.
2) Uttanlandsnevnd við 7 limum og 7 varalimum. Hon røkir sítt starv smb. § 54 í stýrisskipanarlógini og gevur løgtinginum tilmæli í øllum uttanlands-, marknaðar- og verjumálum, eisini um viðurskiftini við Danmark.
3) Landsstýrismálanevnd við 3 limum og 3 varalimum. Hon røkir sítt starv smb. § 38 í stýrisskipanarlógini. Hon hevur heimild at boðsenda løgmanni ella landsstýrismanni at koma á fund at greiða frá ávísum máli.
4) Vinnurnevnd við 7 limum og 7 varalimum.
5) Trivnaðarnevnd við 7 limum og 7 varalimum.
6) Mentanarnevnd við 7 limum og 7 varalimum.
7) Rættarnevnd við 7 limum og 7 varalimum.

Stk. 2. Løgtingsmál eiga at fáa viðgerð í nevnd soleiðis, at samsvar er millum ta viðgerð, málið hevur fingið ella hevði fingið í landsumsitinginin, og viðgerðina í løgtinginum.

14) § 26 verður strikað.

Viðmerking: Tað nýggja við hesi broyting er, at §§ 25, 26 og 34 eru samanskrivaðar og at løgtingsnevndirnar hereftir skulu hava varalimir.

Nevndarlimirnir Vilhelm Johannesen, Finnbogi Ísakson, Sune Jacobsen, Ingeborg Winther, Lasse Klein og Helena Dam á Neystabø mæla til frammanfyri nevndu broytingar í tingskipanini

15) Um § 24 í hesum uppskoti fellur og § 25 verður sannykt, seta somu nevndarlimir fram hetta broytingaruppskot: "Í § 24 stk. 1, falla orðini: "og § 26" burtur og: "í § 28 falla orðini : "og § 26" burtur.
Nevndarlimirnir Vilhelm Johannesen, Finnbogi Ísakson, Sune Jacobsen, Ingeborg Winther, Lasse Klein og Helena Dam á Neystabø mæla til frammanfyri nevndu broytingar í tingskipanini

16) Inngangurin til § 25 fær hetta orðaljóð: "Á hesum fundi verða valdar tær í stýrisskipanarlógini ásettu nevndirnar og tær undir § 26 nevndu nevndirnar undir einum".

17) Í § 26 verða í inngangínum orðini: "Harafturat verða valdar hesar løgtingsnevndir :" strikað.

Viðmerking: Broytingarnar hava til sær, at nevndirnar verða valdar undir einum.

Nevndarlimurin Anfinn Kallsberg mælir til omanfyri nevndu broytingar í § 25 og § 26.

18) § 29. stk. 1. fær hetta orðaljóð: "Løgtingsmenn hava skyldu at taka við nevndarvali."
Stk. 2 verður orðað soleiðis: "Løgtingsformaðurin kann tó ikki verða valdur limur í løgtingsnevnd.

Viðmerking: Næstformenn í formannaskipanum kunna ikki bera seg undan vali til løgtingsnevnd.

19) § 32. stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Nevndarformaðurin í løgtingsnevnd boðar nevndarlimunum til fundar við í minsta lagi 18 tíma freist samstundis, sum hann sigur frá dagsskránni fyri fundin. Uppslag fyri fundin verður samstundis hongt upp í tinghúsinum, og lisið inn á telefonsvararan hjá løgtingsskrivstovuni."

Viðmerking: Nevndin mælir til, at 24 tíma freistin í galdandi tingskipan verður stytt til 18 tíma freist. Eisini mælir nevndin til, at fundarboð verða lisin inn á telefonsvararan hjá løgtingsskrivstovuni.

20) § 32. stk. 2 verður orðað soleiðis:
"Undir serliga átrokandi umstøðum og treytað av, at allir nevndarlimirnir eru samdir um hetta, ber til at víkja frá tíðarfreistini ella áseta aðra fundarskrá. Fundur kann tó í fyrsta lagi verða settur 2 tímar eftir, at boðað er til fundar. Fundurin verður kunngjørdur sambæt reglunum í stk. 1.

Viðmerking: Nevndin er samd um, at tað framvegis skal bera til hjá løgtingsnevnd at halda fund, sum er fráluaðaður við styttri freist enn ásett er í § 32. stk. 1. Tó verður tíðarfreistin ongantíð minni enn 2 tímar. Ætlanin við § 32. stk. 2. er, at hon bert skal nýtast undir serliga átrokandi umstøðum, eins og nummer gongdin skal verða, at løgtingsskrivstovan skal hava boð um fundin. Hetta grein eigur ikki at vera nýtt undir vanliga tingarbeiðinum, men einans undir viðgerðini av málum, sum krevja serliga skjótta viðgerð og tí serliga meðan tingfundur er.

21) § 33 fær hetta orðaljóð: "Skrivað verður í gerðabók um virksemið hjá hvørjari einstakari løgtingsnevnd. Á næsta fundi verður gerðabókin løgd fram til góðkenningar."

Viðmerking: Nevndin hevur broytt orðaljóðið av míguldandi § 33, soleiðis at greinin fær einfaldari orðaljóð. Harumfrum er í greinini ásett, at gerðabókin skal góðkennast á næsta fundi.

Ein samd nevnd mælir til omanfyri nevndu broytingar í tingskipanini.

22) § 34: verður strikað.

Viðmerking: Um § 25 verður broytt sambæt uppskotinum hjá Vilhelm Johannesen, Finnboga Ísaksen, Sune Jacobsen, Ingeborg Vinther, Lassa Klein og Helenu Dam á Neystabø verður § 34 strikað, tí hon verður innskrivað í nýggja § 25.

Nevndarlimirnir Vilhelm Johannesen, Finnbogi Ísaksen, Sune Jacobsen, Jóndur Niclasen, Lassa Klein, Ingeborg Winther og Helena Dam á Neystabø mæla til frammanfyri nevndu broyting í tingskipanini.
Nevndarlimurin Anfinn Kallsberg hevur hesar viðmerking: Avtøka av § 34 ger tað, at løgtingsnevndir nú kunnu taka til viðgerðar øll mál, tað er í stríð við andan í stýrisskipanarlógini.

23) § 36 fær hetta orðaljóð: "Nevndarformaðurin kann við samtykki løgtingsskrivstovustjórans útvega nevndini lønta, serkøna hjálp út yvir ta hjálp, sum løgtingsskrivstovan veitir."

Viðmerking: Nevndin heldur, at henda orðing er greiðari enn migaldandi

24) § 37 verður soljóðandi:
"§ 37. Tá ið nevndarformaðurin heldur, at sjónarmiðini hjá nevndarlimunum eru lýst til fulnar, og allar upplýsingar fingnar til vega, verður álit skrivað.
Stk. 2. Nevndarformaðurin stílar fyri, at álit verður skrivað, sum byggir á fundarfrásagnirnar. Hann ansar eftir, at broytingaruppskot eru sambærilig við uppruna uppskotið. Skrivarin hjá nevndini er honum og hinum nevndarlimunum til hjálpar, tá álit verður skrivað.
Stk. 3. Meirilutin ella minnilutin í nevndini kann lata formanninum skrivligt uppskot um álit.
Stk. 4. Nevndin umrøður ná alt álitið, frá samdari nevnd, meiriluta og minniluta, og ger møguligar broytingar. Allir nevndarlimirnir skriva undir álitið, sum síðani verður handað løgtingsformanninum, ið letur hvørjum tingmanni eintak av álitinum.
Stk. 5. Hóast ásetingina í stk. 4, 2. pkt., kann nevndarálit verða handað løgtingsformanninum, tá meirilutin av nevndini hevur skrivað undir tað."

25) §§ 38-41 verða strikaðar.

Viðmerking: Henda § kemur í staðin fyri migaldandi §§ 37-41

26) § 44, stk. 3, verður soljóðandi:
"Í viðmerkingunum til lógaruppskot skulu verða hesar viðmerkingar:
1. Almennar viðmerkingar, t.v.s.
a) Frágreiðing um galdandi lóggávu og upplýsingar um, hvussu hevur verið og kann verða funnist at henni,
b) ein stuttur samandráttur av nýskapanini við uppskotinum,
c) hvør fíggjarligur kostnaður stendst av uppskotinum,
d) hvørjir almennir stovnar ella aðrir hava havt uppskotið til umrædis, og hvørjar viðmerkingar teirra hava verið,

og 2: Serligar viðmerkingar, har greitt verður frá innihaldinum av hvørjari einstakari grein í uppskotinum. Eisini skal her verða greitt frá ætlanini við greinini, og hvussu hon skal skiljast.

Viðmerking: Nevndin er samd um, at migaldandi § 44, stk. 3, er heldur torfor at umsita, víst verður til orðingina: "skal miðast eftir". Nevndin heldur, tað verða rættari, at sett verða ávís, meiri avmarkað krøv til, hvussu viðmerkingarnar til lógaruppskot skulu skrivast.

Ela samd tingskipanarnevnd mælir til omanfyri nevndu broytingar.

27) § 45, stk. 1, verður soljóðandi: "Uppskot til løgtingslóg verður lagt fram á løgtingsfundi, og eintak av uppskotinum verður latið hvørjum løgtingsmanni. Endaliga orðað uppskot skal vera løgtingsformanninum í hendi 3. dagin fyri framløgufundin."

Viðmerking: Í migaldandi tingskipan er ásett, at løgtingslógaruppskot skal verða handað løgtingsformanninum í seinasta lagi 72 yrkadagatímar fyri framløgufundin. Henda freist er gjord smidligari soleiðis, at "72 yrkadagatímar" er broytt til, "3. dagin fyri framløgufundin".

Nevndarlimirnir Vilhelm Johannesen, Finnbogi Ísakson, Helena Dam á Neystabø og Lasse Klein mæla til frammanfyri nevndu broyting í tingskipanini.

Nevndarlimirnir Anfinn Kallsberg, Sune Jacobsen, Ingeborg Vinther og Tordur Niclasen taka ikki undir við frammanfyri nevndu broyting og seta einki uppskot fram.

28) § 46, stk. 1, fær hetta orðaljóð: "Uppskot kann fáa 1. viðgerð 2. dagin eftir framløgu. Við 1. viðgerð

verður uppskotið umrætt í sínu heild. Broytingaruppskot kann verða fráboðað og umrætt.

Viðmerking: Freistin fyri 1. viðgerð er í nágaldandi tingskipan 48 yrkadagatinar eftir framlogu. Hendu freist verður broytt til: "2. dagin eftir framlogu".

Nevndarlimirnir Vilhelm Johannesen, Finnbogi Ísakson, Lasse Klein og Helena Dam á Neystabø mæla til frammanfyri nevndu broyting.

Nevndarlimirnir Anfinn Kallsberg, Ingeborg Vinther, Tordur Niclasen og Sune Jacobsen, taka ikki undir við frammanfyri nevndu broyting og seta einki uppskot fram.

29) § 47, stk. 3, fær hetta orðaljóð: "Løgtingsformaðurin ger av hvørja nevnd, mál skal beinast í, sbr. tó § 25, stk. 2.

Viðmerking: Hendu broyting er neyðug, um nýggja § 25 verður broytt samsvarandi ti uppskoti sum Vilhelm Johannesen, Finnbogi Ísakson, Sune Jacobsen, Ingeborg Vinther, Lasse Klein og Helena Dam á Neystabø hevur sett fram.

Anfinn Kallsberg tekur ikki undir við omanfyri nevndu broyting.

30) § 48, stk. 1, fær hetta orðaljóð: "2. viðgerð kann verða 3. dagin eftir, at 1. viðgerð endaði, tó ikki fyrr enn 2. dagin eftir, at møguligt nevndarálit er lagt fram.

Viðmerking: Freistin fyri 2. viðgerð, sum í galdandi tingskipan er ásett at vera "72 yrkadagatinar eftir, at 1. viðgerð endaði" og "ikki fyrr enn 48 yrkadagatinar eftir, at nevndarálit er lagt fram", verða við hesum broytt til: ávikavist "3. dagin eftir, at 1. viðgerð endaði" og til: "2. dagin eftir, at møguligt nevndarálit er lagt fram".

Vilhelm Johannesen, Finnbogi Ísakson, Helena Dam á Neystabø og Lasse Klein mæla til hesa broyting í tingskipanini.

Nevndarlimirnir Anfinn Kallsberg, Sune Jacobsen, Ingeborg Vinther og Tordur Niclasen taka ikki undir við frammanfyri nevndu broyting og seta einki uppskot fram.

31) § 48, stk. 2, 2. punktum verður soljóðandi: "§ 46, stk. 2 er á sama hátt galdandi í hesum førum."

Viðmerking: Orðið "geldur" verður broytt til "er .... galdandi".

Ein samd tingskipanarnevnd mælir til omanfyri nevndu broyting.

32) § 49, stk. 1, fær hetta orðaljóð: "3. viðgerð kann vera 3. dagin eftir, at 2. viðgerð endaði, ella eftir at møguligt nevndarálit er lagt fram. § 46, stk. 2 er á sama hátt galdandi í hesum føri."

Viðmerking: Í nágaldandi tingskipan kann 3. viðgerð ikki vera fyrrenn 72 vikudagatinar eftir, at 2. viðgerð endaði, ella eftir at øllit møguligt er lagt fram. Hendu freist verður við hesum broytt til at vera: "3. dagin eftir, at 2. viðgerð endaði eftir, at 2. viðgerð endaði, ella eftir at møguligt nevndarálit er lagt fram."

Nevndarlimirnir Vilhelm Johannesen, Finnbogi Ísakson, Ingeborg Winther, Helena Dam á Neystabø og Lasse Klein mæla til omanfyri nevndu broyting í tingskipanini.
Nevndarlimirnir Anfinn Kallsberg, Sune Jacobsen, Ingeborg Vinther og Tordur Niclasen taka ikki undir við frammanfyri nevndu broyting og seta einki uppskot fram.

33) § 49, stk. 3 verður soljóðandi:
"Broytingaruppskot kann leggjast fram við 3. viðgerð, áðrenn orðaskiftið byrjar. Við 3. viðgerð verða broytingaruppskot og tær greinir, broytingaruppskotið viðvíkir, umrøddar fyrst og koma fyrst til atkvøðugreiðslu."

Viðmerking: Við hesari broyting verður heimilað at leggja fram broytingaruppskot við 3. viðgerð, bert hetta verður gjørt, áðrenn orðaskiftið við 3. viðgerð byrjar.

34) § 50, stk. 3: Sum iskoyti til § 50, stk. 3 verður sett: "Talan er her um nýggja 2. viðgerð og talutiðirnar eru galdandi samsvarandi.

Viðmerking: § er bert greiðari orðað.

Ein samd nevnd mælir til omanfyri nevndu broytingar.

35) § 52 verður strikað.

Viðmerking: Broytingin hevur við sær, at danskar lógir bert verða lýstar á donskum. Uppskotsstillararnir halda, at danskar lógir eiga bert at vera á donskum, og at tørvur er ikki á at fáa umsett tær donsku lógirnar, men at fáa alla lóggávu viðvíkjandi føroyskum viðurskiftum lagdar til løgtingið. Tá verða lógirnar sjálvandi bert á føroyskum.

Nevndarlimirnir Vilhelm Johannesen og Finnbogi Ísakson seta uppskotið frammanfyri fram. Nevndarlimirnir Lassi Klein, Tordur J. Niclasen, Annfinn Kallsberg, Ingeborg Vinthher, Sune Jacobsen og Helena Dam á Neystabø taka ikki undir við uppskotinum.

36) § 55, stk. 2 verður orða soleiðis: "§ 69, stk. 4, er ikki galdandi í hesum førum."

Viðmerking: Orðið "geldur" verður broytt til: "er ... galdandi".

37) § 56, stk. 1, nr. 6 verður orðað soleiðis: "mál, tá ið heitt verður á landsstýrið at leggja fram ávíst løgtingslógaruppskot ella ríkislógartilmælisuppskot og mál viðvíkjandi ríkisrættarligu støðuni og millumlanda viðurskiftum."

Viðmerking: Við hesum verður heimilað at leggja fram uppskot til samtyktar í málum, sum viðvíkja ríkisrættarligu støðuni um millumlanda viðurskiftum.

38) § 61, 5 verður strikað.

39) Sum nýtt § 61, stk. 5 verður sett: "Tingmaður kann seta ríkisumboðsmanninum fyrispurning viðvíkjandi máli, sum hoyrir undir málsræði ríkisins. Ríkisumboðsmaðurin boðar løgtinginum frá, um og tær fyrispurningurin verður svaraður."

Viðmerking: Sbrt. § 14 (stýrisskipannarlógini hevur ríkisumboðsmaðurin embætis vegna uttan atkvøðurætt atgongd at løgtinginum og hevur rætt til á fundum at krevja at koma til orðanna. Nevndin heldur m.a. vísandi til stýrisskipannarlógina, § 14, at tingmenn skulu hava høvi til at seta ríkisumboðsmanninum fyrispurning, men ásannar, at tað sjálvsagt ikki ber til at krevja av ríkisumboðsmanninum, at hann svarar slíkum fyrispurningi.

40) § 62, stk. 1, verður soljóðandi: "Uppskot til løgtingslógir, ríkislógartilmæli og uppskot til samtyktar skulu, fyri at verða viðgjørd, verða framløgd innan 5. mars."
Viðmerking: Framløgufreistin verður í hesum flutt frá 25. til 5. mars. Orsøkin til broytingina er, at skotbráið frá 25. mars, til tingsetan vanliga endar, er ov stutt, tá hugsað verður um, at tað ofta verða nógv mál framløgd, áðrenn freistin er úti. Tískil er neyðugt, at tingið fær longri tíð til viðgerðina í løgtinginum.

Eitt samd tingskipanarnevnd mælir til hesar broytingar í tingskipanini.

41) § 62, stk. 2: "17" verður broytt til: "15"

Viðmerking: Sambært hesi broyting krevst, at tann størst mogaligi minnilutin av løgtingsmonnum skrivar undir fyri at eitt mál kann leggjast fram, aftaná at framløgufreistin er úti.

Nevndarlimirnir Tordur Niclasen, Lasse Klein, Ingeborg Winther, Finnbogi Ísakson og Helena Dam á Neystabø mæla til frammanfyri nevndu broyting í tingskipanini.

Nevndarlimirnir Vilhelm Johannesen, Sune Jacobsen og Anfinn Kallsberg taka ikki undir við frammanfyri nevndu broyting.

42) § 65, stk. 1, nr. 3, verður soljóðandi: "uppskot til løgtingssamtykt, sum áleggur, tilmælir ella heitir á landsstýrið at útinna fyrisitingina ella heimildir sínar eftir stýrisskipanarlógini § 51, § 52, § 53 ella § 54 á ávísan gjølligari útgreindan hátt. Tó kann verða heitt á landsstýrið um at kanna ávíst mál og leggja frágreiðing fyri løgtingið. Eisini er loyvt at heita á landsstýrið sbrt. § 56, stk. 1, nr. 6."

Viðmerking: Henda broyting er tengd at broytingini í § 56, stk. 1, nr. 6, sum sbrt. broytingini heimilar at seta fram uppskot til samtyktar, sum viðvíkja ríkisrættarligu støðuni og millumlanda viðurskiftum. Í hesum sambandi heimilar § 65, stk. 1, nr. 3, mi áheitan á landsstýrið um at kanna ávís mál og leggja frágreiðing fyri løgtingið. Eisini er heimilað at heita á landsstýrið í málum viðvíkjandi ríkisrættarligu støðuni og millumlanda viðurskiftum. Við øðrum orðum er heimildin at heita á landsstýrið víðkað eitt sindur, nevniliga á ríkisrættarliga og millumlanda økinum.

43) § 68 verður orðað soleiðis: "Løgtingsfundir og nevndarfundir verða vanliga hildnir millum kl. 09.00 og 18.00 yrkadagar. Um so er, at arbeiðið krevur tað, kann løgtingsformaðurin/nevndarformaðurin gera av, at tingfundir/nevndarfundir verða hildir millum kl. 18.00 og 22.00. Sunnu- og halgidagar (Ólavsøkudagur undantikin og yrkadagar eftir kl. 22.00 verða løgtingsfundir/nevndarfundir ikki hildnir, uttan so er at serligar umstøður gera tað neyðugt".

Viðmerking: Við hesi broyting, verður greitt sett inn í tingskipanina, at um arbeiðið krevur tað, kunnu eisini nevndarfundir verða hildnir millum kl. 18.00 og 22.00 yrkadagar.

44) § 69, stk. 4 verður soljóðandi: "Dagsskrá til løgtingsfund, sum ásettur er sbrt. stk. 1 og 2 ella broyting í dagsskránni sbrt. § 67, stk. 3, kann ikki verða broytt, uttan at broytingin í dagsskránni er alment lýst dagin fyri fundin. Formaðurin kann altíð uttan nakra aðra freist taka mál av skránni.

Viðmerking: Sbrt. núgaldandi tingskipan skal tílík broyting vera alment lýst í seinasta lagi 24 tímar fyri fundin. Henda freist verður ná í staðin ásett at vera dagin fyri fundin. Harumframt heldur nevndin, at formaðurin skal hava heimild til uttan nakra freist at taka mál av skránni, uttan at formansskapsins samtykki krevst til tess.

45) § 71, stk. 1, fær hetta orðaljóð: "Eftir áheitan frá tingmanni kann tingið loyva honum farloyvi. Farloyvistíðin er í minsta lagi 14 dagar. Avgerð tingsins verður tikin uttan umrøðu eftir munnligum tilmæli frá formanninum."
Stk. 2 og 3 verða strikað, og stk. 4 verður stk. 2.

Viðmerking: Reglur um lønarviðurskiftini hjá tingmonnum, sum hava farloyvi, skulu ásetast í løgtingslóg um samsýning løgtingsmanna.

46) § 74 verður orðað soleiðis: "Tingmaður, ið hevur fingið orðið, skal tala av talarastólinum. Tó kann løgtingsformaðurin, tá ið ræður um sparningar um, hvussu tingviðgerðin skal verða, loyva løgtingsmanni at tala frá sínum sæti."

Viðmerking: Eitt punktum (.) er innsett millum orðini "talarastólinum" og "Tó".

Ein samd nevnd mælir til frammanfyri nevndu broytingar í tingskipanini:

47) § 77 stk. 1. fær hetta orðaljóð: "Tá mál kemur til viðgerðar, spyr løgtingsformaðurin, áðrenn orðaskiftið byrjar, hvørjir framsøgumenn biðja um orðið. Teir fáa orðið eftir floksstødd. Uppskotssetarin kann fáa orðið eftir framsøgumenninar og síðani løgmaður ella landsstýrismaður, um landsstýrið hevur lagt uppskotið fram. Aðrir tingmenn fáa orðið í teirri raðfylgju, teir biðja um tað."

Viðmerking: Sambært broytingini fáa bert teir framsøgumenn, sum boða frá tá orðaskiftið byrjar orðið eftir floksstødd og talutíð, sum framsøgumenn.

Nevndarlimirnir Vilhelm Johannesen, Finnbogi Ísakson, Sune Jacobsen og Anfinn Kallsberg taka undir við omanfyri nevnda orðaljóði.

48) **Lasse Klein, Helena Dam á Neystabø, Ingeborg Vinther og Tordur Niclasen mæla til, at § 77, stk. 1 fær hetta orðaljóð**: "Formaðurin gevur løgtingsmonnum orðið, sum teir hava biðið um tað, hvør eftir annan, tó soleiðis, at framsøgumenn og uppskotssetarin fara fram um hinar. Um ikki annað verður fráboðað løgtingsformanninum, verður fyrsti røðari floksins roknaður sum framsøgumaður í málinum. Á sama hátt kann formaðurin broyta talararaðið at enda kjak um ávís evni í málinum ella í teimum førum, tað annars er mest hóskandi".

Viðmerking: Orsøkin til broytingina er, at uppskotsstillararnir halda tað verða óhóskandi og ódemokratiskt, at teir stóru flokkarnir skulu hava orðið fyrst.

49) Viðvíkjandi § 77, stk. 2. Orðingin er óbroytt, men broytt verður í skjalinum, sum víst verður til í § 77, stk. 2: **Skjal V: Munnligur fyrispurningur og grundgeving .... <u>2 min.</u>**

Viðmerking: Talutíðin í samband við munnligar fyrispurningar verður hervið longd við einum minutti upp í tveir minuttir.

50) § 77, stk. 3 verður orðað soleiðis: "Løgtingsformaðurin kann loyva frávik frá talitíðunum í stk. 2, tá ið vavið í einum máli ger tað neyðugt. Áheitan um meiri talitíð eigur at verða sett fram, áðrenn tingviðgerðin byrjar."

Viðmerking: Núgaldandi § 77, stk. 3, er ásett, at áheitan um meiri talutíð eigur at verða sett fram í seinasta lagi 2 dagar fyri løgtingsfundin. Henda freist verður nú stytt og ásett verður, at áheitan um meiri talutíð eigur at verða sett fram, áðrenn tingviðgerðin byrjar.

51) § 78, stk. 2, 4. punktum, verður soljóðandi: "Formansskapur løgtingsins kann haraftrat gera av, at løgtingsmaður, sum hevur verið átalaður, sleppur ikki á løgtingsfund upp í 14 løgtingsfundardagar."

Viðmerking: Ávísingin í núgaldandi § 78, stk. 3, til tingskipanina § 16 verður strikað, tí ikki er neyðugt í hesari greinini at vísa til § 16.

52) § 84, stk. 2, 1. punktum verður soljóðandi:
"Í teimum førum, hendan skipan er ikki tøk, verður atkvøtt soleiðis, at tingmenn reisa seg úr sæti."

Viðmerking: Hetta er bert ein broyting, sum er ein fylgja av, at teldmatkvøðaskipan nú er útvegað.

53) § 88, stk. 2. verður soljóðandi: "Skriv til løgtingið verða ikki skrivað í gerðabók ella upplisin á tingfundi, uttan í teimum førum, løgtingsformaðurin heldur, at talan er um serligt malantak. Skrivini verða fjølritað, eitt eintak til formannin í hvorjum flokki á tingi. Yvirlit yvir skriv til løgtingið verða sligin upp í løgtinginum og á løgtingsskrivstovuni, so at tingmenn hava høvi til at biðja um avrit av hesum skrivum."

Viðmerking: Broytingin í mun til galdandi skipan er, at yvirlit yvir skriv til løgtingið verður sligið upp í løgtinginum og á løgtingsskrivstovuni soleiðis, at tingmenn hava hovi til at biðja um avrit av hesum skrivum.

54) § 92. stk. 2. verður soljóðandi: "Formansskapurin letur landsstýrinum tilmæli til játtan løgtingsins á komandi fíggjarløgtingslógaruppskoti landsstýrisins innan 1. juli."

Viðmerking: Orðið: "løgtingsfíggjarlógaruppskot" er broytt til: "fíggjarløgtingslógaruppskoti".

55) §§ í tingskipanini fáa nýggj nr. sum samsvarað við tær broytingar sum hervið verða gjørdar.

56) § 95 verður soljóðandi: "Tann broytta tingskipanin fær gildi frá Ólavsøkudegi 1996.
Stk. 2. Samstundis fer út gildi Tingskipan Føroya Løgtings frá 1. juni 1995.
Stk. 3. § 91 fær tó ikki gildi, fyrr enn tað verður ásett við tingsamtykt. Til slík samtykt er gjørd, koma Løgtingstíðindi út eftir teimum reglum, higartil hava verið."

Ein samd tingskipanarnevnd mælir til omanfyri nevndu broytingar í tingskipanini.

Viðvíkjandi § 17: Nevndin hevur viðgjørt § 17 og er samd um, at orðaljóðið verður óbroytt, tó við hesi viðmerking:

"Sambært § 17 kunnu angar útreiðslur verða hildnar av løgtinginum sum stovni, ið ikki hava heimild í galdandi fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg. Viðvíkjandi tulkingini av hesi lógargrein varð spurningur settur fram um, hvat er umfatað av løgtinginum. Nevndin kom til ta niðurstðu, at eisini løgtingsskrivstovan er umfatað, og at løgtingsformaðurin skal fylgja við leypandi fyri at tryggja sær, at ongar útreiðslur verða hildnar av løgtingsskrivstovuni, ið ikki hava heimild í galdandi fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg."

1. viðgerð 10. mai 1996. Málið varð beint beinleiðis til 2. viðgerð utan nevndarviðgerð.

*2. viðgerð 13. mai 1996. Broytingartar frá tingskipanarnevndini til tingskipanina vórða avgreiddar soleiðis: **Pkt. 1-6** samtykt við **28-0-0** atkvøðum. **Pkt. 7** fekk **7-1-22** atkvøður og fall. **Pkt. 8** samtykt við **19-0-9** atkvøðum. **Pkt. 9** samtykt við **17-1-12** atkvøðum. **Pkt. 10** burturdottið. **Pkt. 11** samtykt við **28-1-0** atkvøðum. **Pkt. 12** fekk **12-1-17** atkvøður og fall. Broytingaruppskot til 2. viðgerð til § 25 í tingskipanini samtykt við **22-1-7** atkvøðum. **Pkt. 13 og 14** samtykt við **20-1-9** atkvøðum. **Pkt. 15** samtykt við **27-1-0** atkvøðum. **Pkt. 16 og 17** burturdottin. **Pkt. 18-21** samtykt við **28-0-0** atkvøðum. **Pkt. 22** samtykt við **22-2-4** atkvøðum. **Pkt. 23-26** samtykt við **28-0-0** atkvøðum. Broytingaruppskot til 2. viðgerð til **pkt. 27, 28, 30 og 32** í uppskotinum samtykt við **18-1-10** atkvøðum. **Pkt. 27** samtykt við **16-3-11** atkvøðum. **Pkt. 28** samtykt við **15-4-11** atkvøðum. **Pkt. 29** samtykt við **23-2-5** atkvøðum. **Pkt. 30** samtykt við **14-2-13** atkvøðum. **Pkt. 31** samtykt við **21-3-5** atkvøðum. **Pkt. 32** samtykt við **16-2-11** atkvøðum. **Pkt. 33 og 34** samtykt við **30-0-0** atkvøðum. **Pkt. 35** samtykt við **16-2-12** atkvøðum. **Pkt. 36-40** samtykt við **30-0-0** atkvøðum. **Pkt. 41** fekk **13-1-16** atkvøður og fall. **Pkt. 42-46** samtykt við **30-0-0** atkvøðum. **Pkt. 47** samtykt við **21-2-7** atkvøðum. **Pkt. 49-56** samtykt við **30-0-0** atkvøðum. Uppskotið soleiðis broytt samtykt við 30-0-0 atkvøðum. Samtykt við 30-0-0 atkvøðum at beina málið soleiðis samtykt til 3. viðgerð.*

14. mai 1995 varð loyvi tingsins fingið at víkja frá tíðarfreistini millum 2. og 3. viðgerð. Samtykt við 29-0 atkvøðum.

3. viðgerð 15. mai 1996. Broytingaruppskot til 3. viðgerð frá Jørgen Niclasen o.o. til § 71 varð samtykt við 25-2-2 atkvøðum. Málið sum samtykt við 2. viðgerð og broytt við 3. viðgerð endaliga samtykt við 27-1-0 atkvøðum.

118 Løgtingslóg um íløgustuðul til alivinnuna

Ár 1996, hósdagin 9. mai legði John Petersen, løgtingsmaður vegna seg sjálvan og 16 tingfólk (Óli Jacobsen, Jenis av Rana, Lasse Klein, Bjarni Djurholm, Óli Breckmann, Tórður J. Niclasen, Sunte Jacobsen, Jørgen Niclasen, Jákup Joensen, Kristian Magnussen, Ingeborg Vinther, Sevrin Midjord, Jógvan Adolf Johannessen, Anfinn Kallsberg, Jógvan á Lakjuni, Ávur Zachariasen) fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um íløgustuðul til alivinnuna.

§ 1.

Heimilað verður landsstýrinum í fíggjarárinum 1996 at nýta 10 mió. kr. til íløgustuðul til smoltkeyp.
Stk. 2. Tað er tilskilað, at við orðinum smolt verður meint laksasmolt og sjóbúgvin síl.
Stk. 3. Stuðul verður givin í 1996.

§ 2.

Peningurin verður latin soleiðis, at alarar á sjónum fáa ávísa upphædd útgoldna fyri hvørt útsett smolt.
Stk. 2. Goldið verður í fyrsta umfari sjógvalarunum 0.75 kr. pr. útsett smolt, tá hesar treytir eru loknar:
1. Skrivligt flutningsloyvi frá landsdjóralæknanum fyriliggur.
2. Flutningskvittan dagfest og váttað av keypara og seljara. Landsstýrið (fiskiveiðueftirlitið) skal á flutningskvittanini vátta stødd, góðsku og tal á smolti, áðrenn tað verður sjósett.
3.Grannskoðaraváttan alarans skal vátta, at treytirnar í 1) og 2) eru uppfyltar.
Stk. 3. Peningur verður bert veittur til tey smolt, ið váttan liggur fyri at vera í alibrúkinum 3 mánaðir eftir dagfestingini av flutningskvittanini.
Stk. 4. Endaligu talið av smoltum verður uppgjørt 3 mánaðir aftaná síðstu útseting í fíggjarárinum.
Stk. 5. Fyri at finna, hvussu nógv endaliga skal gjaldast pr. útsett smolt, og hvussu nógv hvør alari skal hava, skulu besi skjøl vera tøk:
1) Skrivligt flutningsloyvi frá Landsdjóralæknanum.
2) Daglestur og undirskrivaðar flutningskvittanir.
3) Skjalprógv fyri hvussu nógv stk. goldin eru fyri til smoltalara.
4) Grannskoðaraváttan fyri at treytirnar í 1), 2) og 3) eru uppfyltar, og at uppgerðin yvir talið, søkt verður um, er rætt.
Stk. 6. Tá landsstýrið hevur endaliga talið av smoltum, peningur skal latast fyri í fíggjarárinum, verður býtt eftir fylgjandi lutfalli:
smolt < 50 g: Lutfall 90
smolt 50-60 g: Lutfall 100
smolt > 60 g: Lutfall 110.

§ 3.

Landsstýrið umsitur lógina eftir umsnæli frá Føroya Havbúnaðarfelag.

§ 4.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar:

Íløgustuðul hevur verið veittur í 3 ár eftir løgtingslóg nr. 73 frá 2. apríl 1993 um íløgustuðul til alivinnuna. Stuðulin varð veittur sum beinleiðis smoltstuðul, 5 kr. fyri hvørt útsett smolt.

Endamálið við stuðlinum var at fáa vinnuna, sum var illa fyri, at menna seg aftur. Tí bleiv løgtingslóg samtykt, sum heimilaði landsstýrinum at veita ein tíðaravmarkaðan stuðul til alivinnuna. Trý ára skeiðið er liðið og er lógin farin úr gildi.

Á fíggjarlógini fyri 1996 eru avsettar 10 mió. kr. til íløgustuðul í alivinnuni, móti 25 mió. kr. um árið 1993-95.

Landsstýrið legði 20. mars 1996 fram løgtingsmál nr. 82/1995: Løgtingslóg um íløgustuðul til alivinnuna. Eftir 1. viðgerð var málið beint í vinnunevndina, men undir nevndarviðgerðini er staðfest, at ongin í vinnunevndini tekur undir við uppskotinum.

Eln meirfluti í nevndini (Jákup Joensen, John Petersen, Óli Jacobsen, Lasse Klein og Álvur Zachariasen) kundi hugsað sær at sett fram broytingaruppskot til uppskot landsstýrisins, soleiðis at prinsippið í gomlu lógini eisini var útgangsstøði fyri stuðlinum til alivinnuna, sum er játtað á fíggjarlógini fyri 1996.

Tá hetta ikki er gjørligt sambært løgfrøðiligari útlegging av stýrisskipanini (manglandi identitet) leggja 17 løgtingsmenn við hesum málið fram av nýggjum til tingsins viðgerð.

Í løtuni er ongin lóggáva á økinum, men innibaldið í hesum lógaruppskoti er á leið tað sama, sum var galdandi seinasta ár.

Grundin til at tað hevur skund at fáa framt hesa lóggávu nú er, at vandi er fyri, at alarar á sjónum, ið ikki eisini hava eina smoltstøð á landi, ikki síggja seg fíggjarliga førar fyri at seta smolt út í summar.

Tað er ongin broyting frá lóggávuni, men stuðulin, ið latin verður eftir hesi lóg, er minkaður úr 25 mió. kr. í fjør til 10 mió. kr. í ár.

Fyrisitingarliga skuldi arbeiðsbyrðan ikki økt.

Uppskotið er gjørt í samráð við vinnuna, og hevur Havbúnaðarfelagið tikið undir við tí.

Viðmærkingar til tær einstøku greinarnar:
Grein 1.
Heimilað er at nýta upp til 10 mió. kr. til íløgustuðul til smoltkeyp. Upphæddin er játtað á løgtingsfíggjarlógini fyri 1996.

Grein 2.
Peningurin verður í fyrsta umfari útgoldin við 0,75 kr. pr. útsett smolt, tá treytir um flutningsloyvi frá djóralækna fyriliggja, og trygd fyri tali og stødd av smolti, ið útsett verður fyriliggur.

Endaliga útgjaldið verður útroknað eftir hvussu, nógv smolt eru eftir í ringunum 3 mánaðir aftaná seinastu útseting í fíggjarárinum. Váttan um rættleika skal fyriliggja frá landsdjóralækna, flutningskvittan v.m. og grannskoðaraváttan, áðrenn smolt verða goldin.

Haralburat verður sum nakað nýtt, at stuðulin verður latin í mun til stødd av smoltum.

Grein 3.
Føroya Havbúnaðarfelag fær ummælisrætt til umsitingina av hesi lóg.

1. viðgerð 10. mai 1996. Málið var beint beinleiðis til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 13. mai 1996. Samtykt við 22-3-6 atkvøðum at beina málið til 3. viðgerð.

15. mai 1996 legði Anfinn Kallsberg vegna seg sjálvan og Heina O. Heinesen, Lassa Klein, Atla Hansen, Álv Zachariasen, Sverre Midjord, Jákup Joensen, Óla Jacobsen, Ingeborg Vinther, Finnboga Arge og Jørgen Niclusen fram søljóðandi

Broytingaruppskot

Í § 2, stk. 2, nr. 1 verður aftan á orðum "Skrivligt flutningsloyvi" sett: "og hetlsukattningarváttan".

14. mai 1995 varð loyvi tingsins fingið at víkja frá tíðarfreistini millum 2. og 3. viðgerð. Samtykt við 29-0-0 atkvøðum.

3. viðgerð 15. mai 1996. Brevtingaruppskot verð samtykt við 23-6-0 atkvøðum. Málið sum samtykt við 2. viðgerð og broytt við 3. viðgerð endaliga samtykt við 25-2-2 atkvøðum.

Løgtingslóg nr. 82, 28. mai 1996.

100-1 Fyrispurningur til Andrias Petersen, landsstýrismann, viðvíkjandi sjúkra- og læknaflutninginum millum Nólsoy og Tórshavn.

Ár 1995, týsdagin 17. oktober boðaði formaðurin frá fyrispurningi frá Bjarna Djurholm, løgtingsmanni, sum er soljóðandi:

Hvat ætlar landsstýriðat gera fyri at tryggja, at sjúkra- og læknaflutningurin millum Nólsoy og Tórshavn verður forsvarligari skipaður?

Viðmerkingar:

Síðani sjúkrabáturin Reyði Krossur fyri skjót mongum árum síðan varð lagdur, hevur sjúkraflutningurin um Nólsoyarfjørð verið ógvuliga tilvildarligur.

Tá stóru rakstrarsparingarnar raktu landið, merkti tað eisini sjúkraflutningin um Nólsoyarfjørð. Ritan, sum eitt skifti tøkti flutningin, varð tikin úr skipanini og Tróndur settur ístaðin. Hetta kundi eisini verið góð loysn. Tá Tróndur á Havnini um náttina, um hann kundi komið at landi í Nólsoy í øllum likindum, og um hann hevði neyðugu fasilitetirnar umborð at flutt sjúklingar um fjørðin. Men Tróndur tykur ikki hesar treytir.

Sum kunnugt liggur Tróndur antin á Gomlurætt ella í Skopun um náttina. Skal lækni til Nólsoyar á nátt, skal hann fyrst koyrast til Gomlurætt. Er Tróndur so staddur í Skopun, skal hann tí sjálvsagt fyrst at í Gomlurætt, áðrenn leiðin kann leggjast til Nólsoyar. Skipanin ger, at tað ganga í minsta lagi tríggir tímar frá, at lækni er boðsendur, til hann er í Nólsoy. Aloftast gongur longri tíð.
Eru líkindini harafturat vánalig, sleppur Tróndur ikki at bryggju í Nólsoy.
Skulfdi flutningurin hinvegin eydnast um fjørðin, og sjúklingurin lokstins komið umborð, gera ónøktandi umstøður, at oftast skulu fleiri menn við at halda børuni á veg inn til Havnar.

Síðan henda skipan fór at virka, eru dømi um, at fólk eru deyð, áðrenn lækni er komin út til Nólsoyar. Ít er at siga, um hesir sjúkratilburðir høvdu havt aðra gongd, var lækni fyri á staðnum, men tað er ein royndur lotur, at tá á stendur at bjarga lívi, er tíðarskotbráið sera avgerandi. Skulu tað ganga tríggir tímar, til lækni er á staðnum og uml. ein aftrat, áðrenn sjúklingurin er á Landssjúkrahúsinum, er tað tí sjálvsagt, at nólsoyingar kenna sjúkraflutningin ónøktandi.

Hóast øllum er greitt, at neyðugt er at spara, so eiga nólsoyingar ikki at vera verri fyri enn aðrir ðnígvar landsins í slíkum álvarsmálum. Tað kann beldur ikki vera rætt, at talan kann gerast um kostnað móti vegis mannalívum.

Tað er ein landsuppgáva at tryggja sjúkraflutningin bæði lands- og sjóvegis. Tí áliggur tað eisini myndugleikunum at skipa so fyri, at nólsoyingum verður veitt munabestu tenastu á hesum øki.
Áðrenn Tróndur var settur í sjúkraflutningsskipanina um fjørðin, røkti Ritan bentla flutning.
Hon var eisini sera vel egnað til uppgávuna, tí

- Ritan liggur á Havnini um náttina (bert 20 min. um fjørðin)
- hon sleppur at bryggju í Nólsoy so at siga í øllum veðri
- og hon hevur sjúkrahøli, har sjúklingabørun er ífundin.

Tí yniskja nólsoyingar Rituna aftur at røkja sjúkraflutningin.

Spurningurin um sjúkraflutningin um Nólsoyarfjørð hevur verið á lofti í løgtinginum farnu árini. Hvørja ferð hevur landsstýrið svarað, at arbeitt verður við málinum.
Hóast hetta er eingin bati enn hendur í málinum.
Við støði í hesi sannroynd verður hesin ábvarsspurningur tí enn eina ferð reistur á løgtinginum.

24. oktober 1995 varð við 27-0-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

2. november 1995 svaraði Andrias Petersen, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

S v a r

Fyrispurningurin var soljóðandi:

Hvat ætlar landsstýrið at gera fyri at tryggja, at sjúkra- og læknaflutningurin millum Nólsoy og Tórshavn verður forsvarligari skipaður?

Í august mánað 1995 hevði landsstýrið fund við ávikavist umboð fyri Havnar Sjúkrakassa og Nólsoyar kommunu. Hesir fundir vóru bert kunnandi. Tosað varð um, hvussu sjúkraflutningurin um Nólsoyarfjørð kundi loysast.

Fyrr í ár hevði sjúkrahússtjóriin greitt almanna- og heilsunevndini í løgtinginum frá, at tað var umleið 6 ferðir um árið, at nólsoyingar høvdu brúk fyri bráðfeingis læknahjálp, og at ein slík tilkallivakt hjá Rituni fór at kosta umleið 40.000 kr. um mánaðin. Haraftrat komu so kr. 5.000 fyri hvørja ferð, Ritan sigldi til Nólsoyar. Tilsamans var kostnaðurin fyri eina tilkallivakt hjá Rituni umleið 510.000 um árið. Øll vóru sannd um, at hetta vóru nógvir pengar at lata fyri hesa sjúkraflutningsskipan.

Landsstýrið vendi sær síðan til Strandferðaskip Landsins, sum kom við einari kostnaðarmeting og við ymiskum møguleikum. Ein møguleiki var, at Ritan røkti sjúkraflutningin alt árið. Kostnaðurin fyri hesa skipan var ca. kr. 450.000. Kostnaðurin fyri, at Ritan røkti sjúkraflutningin vetrarhálvárið (1/10-31/3) kostaði ca. 226.000 kr. Hesin prísurin var roknaður út eftir einari manning upp á 3 fólk.

Eitt uppskot frá S.L. var, at bert tveir mans vóru knýttir til skipanina, men undantaksloyvi mátti fáast frá Sjóvinnufyrisitingini. Hetta uppskot kom at verða mannandi bíligari.

Tann 25. oktober 1995 kom svar frá Sjóvinnufyrisitingini upp á umsóknina, og svarið var noktandi. Grundgevingin var, at Sjóvinnufyrisitingin var av teirri áskoðan, at skipið ikki kundi hava eina manning undir 3 fyri, at allar neyðskipanir fult út kundu virka, samtíðis við, at skipið skuldi kunna verða stýrt frá brúnni.

Nýggjur fundur við Strandferðaskip Landsins er avtalaður, og aðrir nýggir møguleikar eru í hyggju.

100-2 Fyrispurningur til Eilif Samuelsen, landsstýrismann, viðv. analfabetismu í Føroyum.

Ár 1995, týsdagin 24. oktober boðaði formaðurin frá soljóðandi fyrispurningi frá Óla Breckmann, løgtingsmonni:

1. Er tað rætt, sum Landsskúlafyrisitingin smbr. eini kanning hevur fort fram alment, at fimti hvør føroyingur dugir ikki at lesa til húsbrúks?

2. Hvussu nógv fólk duga smbr. somu kanning ikki at skriva føroyskt?

3. Um so er, hvussu stórur partur av játtanini á løgtingsfíggjarlógini til skúlaverkið sum í ár er 381 mió. kr. og næsta ár hækkar til 389 mió. kr. (umframt uml 100 mió. kr. árliga á kommunalum fíggjarætlanum), verður brúktur til at læra føroyskan skúlaungdóm at lesa?

4. Um 1/5 av Føroya fólki ikki hevur lært at lesa í skúlanum, hvussu meta skúlamyndugleikarnir, at hesir næmingar duga onnur fakøki, ið bert kunnu lærast við lesing?

5. Hvussu ber til, at henda skelkandi niðurstøða skúlamyndugleikanna ikki kemur fram fyrrenn nú, eftir at føroyski (og danski) skattaborgarin hevur goldið ialt 5.000.000.000 kr. (5 miljardir) fyri skúla og útbúgving í Føroyum farnu 20 árini?

6. Um Føroya Skúli ikki kláraði at læra næmingar at lesa tey "yvirflóðs" 80-árini við bólgnandi peningajáttanum til "útbúgving og gransking", hvussu ætlar landsstýrið, at løgtingið skal fíggja eyka lesiundirvísing til teir 8.000 føroyingar, sum ikki duga at lesa, nú tá peningur trýtur til almennu nýtsluna?

7. Hvussu ætlar landsstýrið at effektivisera lesiundirvísingina á øllum frálærustigum fyri at fáa samfelagsligt gagn burtur úr teim uml. 50.000 kr. sum hvør av teimum 10.000 næmingunum kostar árliga, sum hvørt ár ganga í skúla?

8. Ella kann niðurstøðan hjá Landsskúlafyrisitingini um 20% anaffabetismu vera ein roynd hjá Føroya Lærarafelag at finna limunum eina vinnuterapi, eins og tilboð um frálæru fyri arbeiðsleys. 11. flokkar, útfylling av lesiætlanum fyri sáttmálaløn, miðnámsdeplar o.a.? Tí støðugt hækkandi pengajáttanir á fíggjarlógini til "útbúgving og gransking"
tykist landsøgn til tann veruleika, at 100-tals foreldur flýggja árliga av landinum við børnum í skúlaaldri undan tí lemjandi skatttatrýsti, sum verður brúkt til at halda m.a. einum skúlaverki uppi, sum ikki virkar so frægt, at børnini læra at lesa?

27. oktober 1995 varð við 9-1-9 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

22. november 1995 svaraði Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, fyrispurninginum frá Óla Breckmann, løgtingsmanni, soljóðandi:

S v a r

****

Lat meg fyri ordans skyld fyrst siga, at spurningarnir hjá Óla Breckmann byggja á ta fyritreyt, at fimti hvør føroyingur dugir ikki at lesa, og at hetta skal vera staðfest sambæri eini kanning. Eingin slík kanning er gjørd, og einki er, sum týðir uppá, at fimti hvør føroyingur dugir ikki at lesa. Sostatt byggja spurningarnir á skeivar fyritreytir.

1. Tað er ikki rætt, at fimti hvør føroyingur dugir ikki at lesa til húsbrúks. Eingin í Landsskúlafyrisitingini hevur alment fort fram, at so er.

   Spurningurin hjá Óla Breckmann hevur ivaleyst samband við eitt brot í Degi og Viku fyri einum ári síðani, har Sernámsfrøðiliga Ráðgevingin og Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli gera vart við kvoldskúlatilboð til vaksin fólk, ið sjálv halda seg torva betri førleika at lesa og skriva.

   Sjónvarpsins yvirskrift til nevnda kut: "Fimti hvør føroyingur ... "komst kanska av misskiljing av práti frammanundan upptøkuni um leysligar metingar uttanlands. Yvirskriftin var Sjónvarpsins egna og var

ikki grundað á kanning her á landi. Seinni í sendingini sigur Sjónvarpið sjálvt, at eingin slík kanning er gjørd her.

2. Burtursæð frá, at altso eingin kanning er gjørd, kann verða sagt, at við endan av undirvísingini í 9. flokki er eitt lógarásett tilboð um at kunna stilla seg inn til fráfaringarroynd í teimum læragreinum, sum næmingurin hevur fingið undirvísing í. Avgerðina til innstilling til royndirnar tekur næmingurin í samráð við foreldrini og skúlan.

   Í nøkrum læragreinum eru royndirnar bæði munnligar og skrivligar. Sambært teimum uppgerðum, sum Landsskúlafyrisitingin hevur hesar royndir, so eru tað so at siga næstan alllir næmingar í einum árgangi, sum fara til hesar royndir, hóast tær eru sjálvbodnar.

   Hesir næmingar mugu undir øllum umstøðum duga at lesa og skilja tekstin fyri at kunna greiða frá vitan, uppliving og metingum av tí, sum lisið verður, og sum royndirnar krevja fyri at kunna verða loystar.

   Øll undirvísing fólkaskúlans hevur sum stavnhald, at næmingarnir skulu kunna hava eitt haldgott støði at standa á og byggja víðari á soleiðis, at teir verða førir fyri at klára seg í vanliga gerandisdegnum, bæði í lesing, skriving, rokning og í samskiftinum við onnur menniskju.

   Móðurmálsundirvísingin er bæði eitt mál í sær sjálvum og eitt amboð til at málbera seg við í samskifti við onnur. Dugnaskapur í lesing er ein beinleiðis fyritreyt fyri kunnleikamenning og menningini hjá tí einstaka.

3. Tað ber sjálvandi ikki til at siga, hvussu stórur partur av samlaðu útreiðslunum til skúlaskap, ið fer til at læra næmingarnar at lesa.

   Til sernámsfrøðiligt virksemi sum heild verða nýttar einar 26 mill. kr. árliga. Umleið helmingurin eru útreiðslur til Skúlan á Trøðni, og hin helmingurin verður nýttur til bøtandi serundirvísing úti á skúlunum - herí serundirvísing í lesing og skriving.

4. Vit rokna við, at ivaleyst munnu eisini hjá okkum vera nokur, ið vegna tørvandi førleika at lesa og skriva eru durvað at menna seg á øðrum fakøkjum og illa halda seg til.

   Lógin um frítíðarundirvísing gevur kommununum møguleika at skipa fyri serundirvísing, soleiðis at fólk kunnu bøta sær um lesi- og skriviførleikan - eitt nú um tey ætla sær at fara undir eina útbúgving.

   Í miðnámsútbúgvingunum kann skipast fyri sernámsfrøðiligari hjálp eftir tørvi, eisini til næmingar við lesitrupulleikum.

5. Skúlamyndugleikarnir arbeiða støðugt við at halda og at bøta um undirvísingingardygdina í skúlanum, eisini lesiundirvísingina. Á hvørjum ári verða nú eftirútbúgvingarskeið hildin, júst innan lesing. Hesi skeið eru fullteknað hvørja ferð. Ráðgevin í byrjanarundirvísing arbeiðir so at siga við lesing burturav. Í skúlunum ganga lærarar nógv upp í evnið lesing. Tikið verður alt meira undir við hugburðinum um næmingatillagaða undirvísing. Hervið eru vánir til, at færri verða teir næmingar, ið ikki duga rímiliga væl at lesa, tá teir fara úr skúlanum.

100-3 Fyrispurningur til Andrias Petersen, landsstýrismann, viðvíkjandi niðurskurði av landssjúkrahúsinum

Ár 1995, fríggjadagin 27. oktober bøddi formaðurin frá sáttfólkandi fyrispurningi frá Jenis av Rana, løgtingsmanni:

FYRISPURNINGUR

Hvørjar akuttar atgerðir hevur landsstýrismaðurin í almannamálum ætlanir um at seta í verk fyri at forða fyri tí undirgravan og oyðileggjan av landssjúkrahúsinum, centralsjúkrahúsi føroyinga, sum verður framd júst í hesum døgum?

Viðmerkingar:

Í farnu viku frættist enn eina ferð um ágang politikara og embætismanna móti føroyska heilsuverkinum. Eitt ørandi tal av arbeiðstinum krevjast spardir innan primeru heilsurøktina **(tey gomlu, sjúku og nýføddu!!!)**, einki røkist fyri, at stríðsmálið við norðmenn yvirlæknafelagini verður loyst, og stendur tí **blokada teirra av føroyska sjúkrahúsverkinum** við, røktarheimmi í Sandoymi standa framvegis gapandi **tóm**, nólsoyingar eru enn einaferð á veg inn í ein ótryggan vetur uttan **ein forsvarligan sjúkraflutning**, og loksins noyðist landssjúkrahúsið (centralsjúkrahúsið hjá øllum føroyingum) at fremja **vandamiklar niðurskurðir**, tí stjórar og politikarar ikki hava skilt **lívsneyðugu** týðningin av einum vælvirkandi heilsuverki.

Seinasta 5 árini hava verið ein áhaldandi ágangur móti arbeiðsfriðinum á hesum viðkvæma arbeiðsplássi - Landsssjúkrahúsinum. Oman á alt er játtanin til lívsneyðugu uppgávurnar, sum har verða røktar, minkaðar, og hava staðið í stað, so tær í dag eru 208 mió. sammett við 248 mió. fyri 5 árum síðani.

Hetta hevur longu ført við sær, at serútbúgvin starvsfólk eru farin av landinum, og onnur bert bíða eftir úrslitinum av verandi ætlanum, áðrenn eisini tey leita aðrar leiðir.

Í staðin fyri at sigga hesar veruleikar í eyguni og fremja bráðneyðugu atgerðirnar, tykist landsstýrismaðurin at velja at stinga høvur í sandin og nokta veruleikan - tó at júst hann átti at kent trupulleikarnar betur enn flestu.

Kanningar gjørdar í grannalondum okkara vísa, at fremst av tí, sum fólk prioritera, sum tað tey vilja láta skattapeningin fara til, er heilsuverkið og lógreglan. Lógreglan tykist fáa frið, dann taka sær av henni (og verja hana), men hví loyvir landsstýrismaðurin bendan áhaldandi ágangin og niðurskurðin innan heilsuverkið, hetta økið, sum skattaborgarin so fegin vil geva tað til, sum er neyðugt fyri, at hann kann kenna seg tryggan.

Hví letur heilsumálaráðharrin hánt um tær ávaringar um uppsagnir (og tær faktisk longu hendur) frá vælkvalifiseraðum læknum og sjúkrusystrum, sum áhaldandi eru burnar honum og landsstýrinum seinastu árini?

Hví letur landsstýrismaðurin hánt um tær ávaringar, sum kanska dagliga eru burnar honum og landsstýrinum, um ótrolandi arbeiðsviðurskifti hjá øllum bólkum á landssjúkrahúsinum, vegna ekstra niðurskurðir, samstundis sum nýggjar arbeiðsbyrðar verða álagdar.

Hví letur landsstýrismaðurin ikki fíggjarligu játtanina fylgja við teimum nýggju arbeiðsbyrðunum, sum verða álagdar heilsuverkinum, og tað serliga landssjúkrahúsinum.

Hví sker landsstýrismaðurin ikki fíggjøgnum og tryggjar nólsoyingum sonnu trygd á sjúkraflutningsøkinum, sum verður veitt øllum øðrum føroyingum.

Hví loyvir landsstýrismaðurin hesa miðvísu oyðileggjanina av heilsuverkinum, bæði tí primera og sekundera, sum dagilga fer fram?

2. november 1995 varð við 9-1-9 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

28. november 1995 svaraði Andrias Petersen, landsstýrismaður soleiðis:

SVAR

Játtanin til landssjúkrahúsið í fíggjarárinum 1995 er 208 mió. kr. Játtanin í uppskoti til fíggjarlogtingslóg árið 1996 er 211 mió. kr. Hartil er barnsburðargrunnur settur á stovn, tvs. at landssjúkrahúsið skuldi sloppið uttan eykaútreiðslum til barnsburðarfarloyvi í føstum starvi, tvs. at her er ein øking í játtanini til landssjúkrahúsið uppá góðar 3 mió. kr. í mun til fíggjarárið 1995, og soleiðis eingin ætlan um hvørki undirgravan ella oyðileggjan.

100-4 Fyrispurningur til Andrias Petersen, landsstýrismann, viðvíkjandi heimarøktini

Ár 1995, hósdagin 2. november bukaði formaðurin frá saljóðandi fyrispurningi frá Róni Sivertsen, løgtingskvinnu:

FYRISPURNINGUR

Ætlar landsstýrið at varðveita verandi Heimarøktarskipan við økjandi fíggjarligum og arheldslígum krøvum til stovn og starvsfólk við somu peningajáttan, ella hevur landsstýrið nakra ætlan um nýskapan í hesum parti av eldrarøktini, sum kann tryggja, at sjúk og óhjálpin heima, fáa ta røkt, teimum tørvar?

Viðmerking:

Heimarøktarskipanin hevur fingið boð úr Tinganesi um at halda seg innan fyri peningajáttanina í hesum fíggjarári.

Tað hevur heimarøktin annars gjørt á hvørjum ári higartil.

Men nú útskriva sjúkrahúsini fyrr enn vant sjúklingar, sum ofta mugu fáa røkt heima. Eisini flyta føroyingar í yngra ættarliðnum av landinum undan skattatrýsti, so teirra gomlu avvarðandi sita eftir óhjálpin og mugu fáa heimarøkt. M.a. av hesum orsøkum hevur í heyst ikki borið heimarøktini til at koma niður aftur á sama útreiðslustøðið sum áðrenn summarfrítíðina (tá útreiðslur vanliga tuppa).

Við verandi játtan klúrur heimarøktin ikki at veita neyðugu hjálpina. Rúmd skal eisini finnast á somu játtan sum higartil fyri partsgjaldi til fleiri komandi eldrahýli kring landið, til ALS gjald og til nýggja strammari koyrigjaldsskipan.

Tey gomlu kenna seg ótrygg og velja tí meir enn fyrr at flyta á røktarheim, sum jú er dýrasta loysnin og av markað í búplássum.

Tað er eyðvitað, at landsstýrið er um at spreingja verandi skipan, sum rakar tey óhjálpnu harðast. Er tað tí ikki nú búgvin til at gera broytingar í Heimarøktini soleiðis, at fólkapensiónin verður sonnikið lug og

skattafrí, samstundis sum ein partur av fíggjarjáttanini til Heimarøktina verður veittur teim gomlu heinleiðis, so tey sjálvi hava ráð til at gjalda fyri sína heimahjálp í tann mun, teim torvar hana?

Persónlig røkt og har, sum persónur ikki er førur fyri at gera sær mat, eiga tó altíð at vera uppgávur, sum heilsuverkið eigur at røkja.
Henda broyting hevði ført við sær stórar sparingar hjá tí almenna, og tryggjað frælsi hjá tí einstaka at velja sær sína heimahjálp.

7. november 1995 varð við 26-0-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

1. desember 1995 svaraði Andrias Petersen, landsstýrismaður soleiðis

SVAR

Í fíggjaráritnum 1995 eru avsettar 60 mió. kr. til heimarøktina tvs. samlaðu heimahjálparskipanini og Heilsu- og heimasjúkrasystraskipanini.

Í summar sást, at tann nú samanlagda heimarøktin nýtti meira pening enn svarandi til játtanina, og tí fekk Heimarøktin boð um, tá árið var úti, at vera innanfyri teir karmar, sum avsettir vóru. Tað er skylda landsstýrisins at ansa eftir, at teir pengar, sum settir eru av á fíggjarlógini, verða nýttir mest skynsamt, og at játtanirnar verða hildnar. Boð landsstýrisins til Heimarøktina vóru at ansa eftir, at játtanin helt, og tað hevur Heimarøktin gjørt við at minka um nýtsluna, serliga har tað snýr seg um lættari hjálp, meðan tey røktarkrevjandi støðugt fáa ta hjálp, teimum nýtist.

Játtanin fyri komandi ár er á sama støði sum seinast, men metir landsstýrið, at tað skuldi framvegis verið ein góð heimarøktarskipan við teimumpengum, sum nú eru. Eldrasambýlir, sum ætlanin er at seta á stovn, skuldu ikki dýrka stórvegis um skipanina, tað eru jú gomul, sum fáa heimahjálp hvør sær heima, sum koma at búgva saman í eldrasambýlum, so samanumtikið skuldi tað ikki dýrka skipanina, men tænastustøðið skuldi hækkað.

Landsstýrið er væl vitandi, at røktartørvurin í framtíðini kemur at økjast, hæði tí at fólk verða eldri, og at parturin av eldri fólki er størri í samfelagnum í dag, við tað at fráflytingin mest er millum tey yngru. Tvs. at tað vera færri avvarðandi at taka sær av teimum eldru. Sum fíggjarkarmurin er fyri 1995, so hevur ikki verið møguligt at hækka játtanina, men landsstýrið heldur framvegis, at heimarøktarskipanin, sum er ein týðandi táttur í eldrarøktini í Føroyum, við neyvari stýring og eftiransni, kann geva eina góða tænasni til okkara eldru medborgarar.

100-5 Fyrispurningur til Óla Jacobsen, landsstýrismann, viðvíkjandi støðu fiski- og útróðrarmanna í samband við lógina um arbeiðsloysistrygging.

Ár 1995, hósdagin 2. november boðaði formaðurin fram soljóðandi fyrispurningi frá Tordi J. Niclasen, løgtingsmanni:

FYRISPURNINGUR

Hvat meinar landsstýrið um støðu fiski-og útróðrarmansins í samband við ALS skipanina?

Hvørjar ætlanir eru um at broyta skipanina við atliti til støðu fiski-og útróðrarmansins?

Eru ettlanir um at broyta skipanina, nær verður hetta arbeiðið so fingið frá honduni?

Viðmerkingar:
Síðan lógin um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing fyri nærum 4 árum síðan kom í gildi, er tað serliga ein bólkur av lønmóttakarum í hesum landi, sum hevur verið við skerdan lut og havi sera avmarkaðar møgu leikar at fáa nyttu av nevndu lóg.

Her er talan um føroyska fiski- og útróðrarmannin.

Sjálvt um hesi í fult mát gjalda í skipanina, so eru teir fyri órettvísi, tí inntøkugrundarlag teirra svíkur.

Fyri at verða roknað uppí, mú eigari av útróðrabáti leggja bátin og lita fiskiloyvið inn. Treytin fyri at fáa arbeiðsloysistryggingina útgoldna er, at viðkomandi ikki fer við sama útróðrarfari innan eitt ár.

Fyri at fiskimaður kann fáa stuðul, skal hesin verða uppsagdur og ikki fara við skipi hjá sama reiðara næstu 6 mánaðir.

Sum dømi her kundi eisini verið nevnt, at fer skip á sleipistøð, og arbeiðið vísir seg at taka longri tíð enn mett, ja, so fær fiskimaðurin ikki arbeiðsloysisstuðul - hóast hann í royndi og veru er arbeiðsleysur.

Dømi eru um, at skip soleiðis hava ligið í mánaðir.

Miðflokkurin hevur áður gjørt vart við hesi truplu viðurskifti fiski og útróðrarmansins.

Svarið hevur verið: "Arbeitt verður við málinum."

Nú hevur verið "arbeitt" nóg leingi, og eigur henda stirvna, órettvísa skipanin sum skjótast at verða broytt fiski- og útróðrarmanninum at gagni.

7. november 1995 varð við 25-1-0 atkvøður samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

28. november 1995 svaraði Óli Jacobsen, landsstýrismaður soleiðis:

SVAR

Viðurskiftini hjá fiski- og útróðrarmonnum í Arbeiðsloysisskipanini eru fyri ein stóran part skipað við kunngerðum, sum eru skotnar upp av stýrinum, har hesir bólkar eru umboðaðir. Í hesum kunngerðum er so fastlagt, sum tað er gjørligt innan lógarinnar rammur, tikið hædd fyri tey serstøku viðurskifti, sum eru galdandi fyri nevndu bólkar. Men serstakliga fyri útróðrarmenn er trupult innan rammurnar av ALS at greiða teir trupulleikarnar, sum teir hava drigist við vegna tað óvanliga fiskaloysið, sum útróðrarmonnum hevur verið fyri seinastu árini. Landsstýrið hevur roynt at bøta um hesi viðurskifti við tí minstulønarskipan fyri útróðrarmenn, sum hevur verið í gildi.

Eisini hevur umsitingarliga verið tikin hædd fyri teirri støðu, sum fiskimenn kunnu koma í, tá skip óætlað liggja í fleiri mánaðar.

Hóast hetta metir landsstýrið, at lógin framvegis er ov stirvin viðvíkjandi støðuni hjá fiski- og útróðrarmonnum. Landsstýrið hevur í heyst fingið tilmæli til eina endurskoðan av verandi lóggávu. Við í hesum tilmæli eru sjónarmiðini hjá feløgum hjá fiskimonnum. Hesi sjónarmið verða eisini tikin við í teirri endurskoðan av lógini, sum væntandi verður løgd fyri løgtingið í hesi lingsetu.

100-6 Fyrispurningur til Andrias Petersen, landsstýrismann, viðvíkjandi framtíðini hjá Klaksvíkar Sjúkrahúsi

Ár 1995, mánadagin 13. november boðaði formaðurin frá soljóðandi fyrispurningi frá Róni Sivertsen, løgtingskvinnu:

FYRISPURNINGUR

Ætlar landsstýrið at Klaksvíkar Sjúkrahús framhaldandi skal hava eina medicinska, og eina kirurgiska deild?
Hvussu ætlar landsstýrið at tryggja norðoyingum trygg sjúkrahúsviðurskifti?

Viðmerkingar:

Klaksvíkar Sjúkrahús hevur fingið boð úr Tinganesi um at spara umleið 2 mió. kr.

Neyðugt verður at spara aðrar 2 mió. kr. í sambandi við sáttmáladundna lønarlækking, nýggjan sáttmála við yvirlæknar og hall og niðurskurð í samskiftinum við Norðoya Røktarheim.

Hóast javnt virksemi á øllum trimum sjúkrahúsum, hevur Klaksvíkar Sjúkrahús havt lægst øking í játtanini, frá 1980 til 1988, og størstu sparingar frá 1989 til 1996.

Saunstundis sum hini sjúkrahúsini standa í stað ella vaksa í peninganýtslu, verður Klaksvíkar Sjúkrahús framhaldandi skorið niður, og er ætlanin fyri 1996 nærum tann sama sum fyri 1986.

Hóast stóru skerjingarnar í játtanini og færri starvsfólk, hevur Klaksvíkar Sjúkrahús á leið sama virksemi sum áður.

Umleið 25% av innløgdu sjúklingunum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, koma aðrastaðir úr Føroyum enn Norðoyggjum.

Ein lutfallsliga stórur partur av kostnaðinum til nýtsluvørur hjá Klaksvíkar Sjúkrahúsi, verður nýttur til kostnaðarmikhar skurðviðgerðir, so sum liðaútskiftingar.

Klaksvíkar Sjúkrahús hevur lítla, men virkna, medicinska deild.

Klaksvíkar Sjúkrahús stendur fyri umleið 20% av samlaða virksemnum í føroyska sjúkrahúsverkinum og lættir Landssjúkrahúsinum nógv um, serliga á ortopædiska- og eisini medicinska økinum.

Kanningar eru gjørdar á smáu sjúkrahúsunum í Danmark og onki er, sum bendir á at tey eru dýrari at reka, hinvegin er viðgerðin ofta betri og sjúklingarnir betri nøgdir.

Landssjúkrahúsið hevur hvørki orku, ella umstøður til, at taka sær av tí virksemi sum fer fram á Klaksvíkar Sjúkrahúsi í dag. Verður átaqt Landssjúkrahúsinum at yvirtaka partar av virksemnum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, verður neyðugt at bækka játtanina hjá Landssjúkrahúsinum munandi.

Leiðsla og stýri hava staðfest, at skal játtanin fyri 1996 haldast verður neyðugt, at niðurleggja ein part av núverandi virksemi.

Fylgjurnar verða ógvusligar, og kunnu í ringasta føri kosta mannalív. Dygdin av viðgerðini til sjúklingar úr Norðoyggjum verður fallandi og útreiðslurnar til samlaða sjúkrahúsverkið økjast.

Ikki er langsíðuni at syndarligi vanlukku, sum kruvdi 5 mannalív, hendi í sambandi við sjúkraflutning millum

Klaksvík og Tórshavn. Ótryggleikin verður stórur bæði fyri sjúklingar og læknar, og trupult verður at varðveita skikkaðar læknar undir slíkum arbeiðsumstøðum.

Niðurstøðan er, at sparingin er meiningsleys og at tíðin nú er komin til at greitt verður frá, hvor ætlanin við Klaksvíkar Sjúkrahúsi er, og at norðoyingar fáa at vita um teir trygt kunnu líta á tað tilbúgvingarstøðið, ið Klaksvíkar Sjúkrahús framyvir fer at kunna bjóða.

22. november 1995 varð við 22-0-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

16. januar 1996 svarað Andrias Petersen, landsstýrismaður soleiðis:

SVAR

Í landsstýrisins uppskoti til fíggjarlóg fyri 1996 vórðu avsettar til Klaksvíkar Sjúkrahús 35,838 mió. kr. íóti 38,014 mió. kr. í fíggjarárinum 1995. Hendan lækking, gjørd úf frá tí aðalsjónarmiði, at neyðugt var at spara á fíggjarlógini fyri at fáa javnvág í fíggjarlógina 1998, og at neyðugt var innan sjúkrahúsverkið eisini at spara, og mett varð har, at Klaksvíkar Sjúkrahús hevði tað mest ríkiligu játtanina.

Til spurningin um landsstýrið ætlar, at Klaksvíkar Sjúkrahús framaldandi skal ava eina medisinska og eina kirurgiska deild, kann eg svara, at ta er eingin ivi um, at bæði medisinskir og kirurgiskir sjúklingar koma at vera innlagdir á Klaksvíkar Sjúkrahúsi akutt, og kemur hetta framhaldandi at vera so.

Viðvíkjandi ætlaðari innlegging er tað øðrvísi, har er tað ofta serkunnleikin á læknaøkinum, sum avger hvar sjúklingurin verður innlagdur.

Klaksvíkar Sjúkrahús hevur havt medisinskan yvirlækna í føstum starvi í 80'unum, men var hesin í farloyvi í langa tíð. Síðani umleið 1992 hevur eingin fastur seerlækni verið í medisinskum sjúkum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, hóast starvið hevur verið lýst leyst. Ásannast mál, at ógvuliga trupult er at fáa medisinskar yvirlæknar til tey smærru sjúkrahúsini.

Tá spyrjarin spyr um Klaksvíkar Sjúkrahús framhaldandi skal hava eina medisinska og eina kirurgiska deild, kemur hetta fyrst og fremst at vera vgjørt av, um ein fær serlæknar á medisinskum ella kirurgiskum øki. Tað er eingin meining í at hava serdeildir unan serlæknar.

Uppá fyrispurning um hvussu landsstýrið ætlar at tryggja norðoyingum trygg sjúkrahúsviðurskifti er tað landsstýrisins fatan, at hóast sparingar á sjúkrahúsøkinum, so ber til at hava trygg sjúkrahúsviðurskifti. Tað avgerðandi á hesum økinum er, hvat kvalifiserað fólk ein fær til arbeiðis.

Til seinast, tað er ikki ætlanin at niðurleggja nakað av teimum smáu sjúkrahúsunum.

100-7 Fyrispurningur til Sámal Petur í Grund, landsstýrismann, viðv. Føroysku Altjóða Skipaskrásetingini

Ár 1995, mikadagin 22. november boðaði formaðurin frá soljóðandi fyrispurningi frá Óla Breckmann, løgtingsmanni:

FYRISPURNINGUR

Ætlar landsstýrið at broyta FAS, so at føroyskir og útlendskir skipaeigarar fáa rakstrarligan fyrimun av at skráseta skip í Føroyum, og Føroyar fáa fíggjarligan vinning av FAS?

Viðmerkingar:

FAS varð ein tungur burður, og tað eydnaðist ikki fólkaflokkinum í teirri samgongunni at evna skipanina, so hon gjørdist rakstrarliga og skattliga attraktiv beildur hjá útlendskum feløgum at skráseta sínu skip í Føroyum.

Úrslitið er, nú skipanin hevur meir enn trý ár á baki, at bert fá skip eru skrásett í FAS, og av teimum bert hendinga útlendskt skip.

Tað ljóðar nú eisini, at krøvini til FAS frá danskari síðu verða herd, so tað verður enn meiri útlitsleyst enn higartil hjá útlendingum at brúka FAS.

Tað skilst eisini, at almenna fyrisitingin av hesum málsøki er tadnað sundur millum fýra stovnar. Skipaskráseting, Partafelagsskráseting, Sjóvinnufyrisiting og Skipasýn. Alltso aftur eitt dømi um, at føroysk almenn fyrisiting er til fyri sína egnu skuld heldur enn fyri at tæna eini samfelagsliga berandi vinnugrein.

Tað er bráðneyðugt at broyta FAS, so hon virkar til fruma fyri føroyska sjóvinnu. Hetta skuldi verið náttúrlig vinnugrein við longum royndum aftan fyri, sum kann útvega føroyskum sjómonnum arbeiðsplássi, geva arbeiðsplássi í vinnuligari skipaumsiting á landi og sostatt vera øllum búskapinum til fíggjarligan fyrimun - í staðin fyri sum nú bert at virka sum almenn vinnuterapi.

Nevnast kann til sammetingar, at 10 ár eru liðin, síðan Isle of Man, utan serliga sjóvinnusiðvenju, fekk sína egnu altjóða skipaskráseting. Í henni eru nú skrásett 130 útlendsk farmaskip, 424 stuttleikabátar ("yachts") og 150 fiskiskip, falt 2,9 miljónir tons deyðvekt. Sjóvinnufyrisitingin á Man telur sløk 20 fólk, men 350 Manbúgvar starvast har á oymi við at umsita henda altjóða skrásetta skipaflota.

27. november 1995 varð við 29-0-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

7. februar 1996 svaraði Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður soleiðis:

S v a r

Sum kunnugt varð FAS-skipanin sett í gildi í juni 1992 við tí endamáli at betra um kappingarforið hjá føroysku handils- og ferðamannavinnuni í uttanríkissigling, at skapa øktar vinnumøguleikar í handils- og ferðamannavinnuni á føroyskum kjøli, at varðveita og menna tað umhvørvið, sum føroyska handils- og ferðamannavinnan stendur fyri og at varðveita flest møgulig arbeiðsplássi í føroyska samfelagnum. Skipanin skal somuleiðis varðveita tey handils- og ferðamannaskip, sum eru undir føroyskum flaggi, herundir møguleikan fyri valutainntøkum, at tryggja arbeiði og inntøkugrundarlag í øðrum vinnupørtum við tilknýti til sjóvinnu sum skipasmiðjuvirksemi og annað virksemi og at varðveita og menna tann førleika, sum føroyingar hava í hesi sigling og vinnu.

FAS-skipanin er tillagað altjóða viðurskiftum, sum Føroyar hava tikið undir við, um tryggleikan og arbeiðsviðurskifti á sjónum og loyvt er útlendingum at gera fløgur og at starvast á føroyskum skipum í tann mun, hetta er mett at menna vinnuna sum heild og eru starvstreytirnar á FAS-skipum tær somu sum í vanligu skipaskránni við teimum undantøkum, sum fylgdu av broytingum í skattalógini og sjóvinnulógunum.

Í 1992 vóru 16 skip skrásett í FAS, og í dag eru 18 skip í skránni, harav eru 4 útlendsk. Landsstýrið hevur bøtt um skipanina og tillagað viðurskiftini já útlendingum á FAS skipum og hjá útlendskum skipaeigarum. Skattaásetingin er 35% at brutto, bar afturheeringin er 28% til reiðaran. Sjómenn í FAS gjalda ikki til arbeiðsloysisskipanina og reiðarar á FAS-skipum sleppa undan at rinda gjald til trygdargrunnin og arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin við gildi frá 14. juni 1995. Landsstýrið fer at leggja uppskot fyri Løgtingið um tryggingarlóggávuna, sum fer at loyva skipaeigarum at tryggja síni skip eisini utanlands.

Spurt verður, um danir herða síni krøv til FAS? Hesin spurningur áttu at verið betri undirbygdur, tí sum kunnugt er skrásetingar- og sjóvinnulóggávan sermál, so bert við teknisku krøvum kemur danska skipaeftirlitið, sum hoyrir til felagsmálinni, inn í myndina. Eingin danskur lóg, kungerð ella teknisk fyriskipan

verður sett í gildi í Føroyum, uttan so at Sjóvinnufyrisitingin og Skipaeftirlitið saman við vinnulívinum í Føroyum eru eftirspurd og lata landsstýrinum sínni tilmæli. Teknisku krøvini í Føroyum eru tey somu, tó at skip eru skrásett í FAS. Hetta er ein fyrimunur, um henda skipanin ikki skal gerast ei "B" klassaskipan (hendeikaskipan), og landsstýrið fer at halda fast um, at skip, skrásett í FAS, hava sama trygdarstøði sum onnur føroysk skip og eisini eru Føroyar í hesum málsøki saman við Danmark um trygdina í alheimsfelagsskapinum IMO (International Maritime Organisation). Hóast donsk krøv haraftrat eru ásett við atliti til ES-reglur, so er tað upp til føroyskar mybdugleikar at avgera, hvussu reglurnar skulu verða at galda í Føroyum.

Hvat viðvíkur umsitingini í Føroyum, so eru tað ikki 4 stovnar, sum umsita hetta málsøki. Sjóvinnufyrisitingin og Skráseting Føroyar er ein samanlagdur stovnur við 3 fólkum, sum taka sær av sjóvinnumálum, herundir FAS.skipanini, og húsast sman vi Skipaeftirlitinum, sumer ein danskur stovnur í Føroyum. Vinnan hevur eitt stað at venda sær til, og er hetta eitt dømi um, hvussu umsitingin er rationaliserað og miðsavnað til frama fyri hesa vinnugrein.

Fyri at Føroyar kunnu fáa búskaparligan vinning av FAS, so má skipatalið økjast munandi, fyria í valutainnsiglingi verður samsvarandi.

Við broyttari tryggingarlóggávu og við eini nettolønarskipan, sumvinnan kan góðtaka, verða fortreytirnar hjá føroyskum og útlendskum skipaeigarum til at gera íløgur í FAS.

Ætlan landsstýrisins er at seta ein arbeiðsbólk at endurskoða FAS-skipanina til tess at kanna, um verandi skipan kann gerast betri, og at kanna, hvussu skipanin kann broytast, soleiðis at fleiri útlendsk skip koma í skipanina.

100-8 Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann, viðv. almennum starvssetanum og tvingsilssølum

Ár 1995, mikudagin 22. november boðaði formaðurin frá soljóðandi fyrispurningi frá Óla Breckmann, løgtingsmanni:

FYRISPURNINGUR

1. **Hvussu nógvar tvingsilssølur hava verið higartil í ár, og hvussu nógvar av teimum hava verið sethús?**

2. **Hvussu nógv almenu størv eru sett higartil í 1995?**

3. **Ætlar landsstýrið at halda fast við hesa gongd?**

Viðmerkingar:

Dag og dagliga síggjast blaðlýsingar um tvingsilssølur.

Í somu bløðum eru ofta eisini almennar starvslýsingar.

Ein vaksandi almennur sektor ber boð um støðugt tyngri skattatrýst.

Tey tvingsilsseldu rinda sum kunnugt eisini skatt til m.a. fyrisiting, heilsu-, skúla- og almannamál. Hesar útreiðslur hækka tilsamans uml. 70 mió. kr. frá 1994 til 1996.

Skattatrýstið hevur verið við til at rent mong á húsagang.

Fleiri 100 skattgjaldarar eru rýmdir av landinum, luvist undan skattarýsti, luvist undan skuld, síðan hendla samgongan tók við. Úrslitið er, at færri og færri skattgjaldarar bera sumu skattligu byrðu.

Løgtingið er um at leggja seinasta hond á álitið til komandi fíggjarlóg. Tað er onnur av tilsamans fýra fíggjarlógum, sum mynda politikkin hjá hesi landsstýrissamgongu.

Við hetta lag er bert spurningur um tíð, til botnurin aftur rýkur undan búskapinum.

Hvussu ætlar landsstýrið at bjarga almenna sektorinum undan sama niðurbreiðing, sum vinnulívinum hevur verið fyri?

Hvussu ætlar landsstýrið at venda gongdini, so vit fáa ein lønsaman vinnuligan sektor, sum er lívsneyðugur fyri Føroya framtíð - eisini til at fíggja ein høskandi almennan sektor.

27. november 1995 varð við 22-7-0 atkvøðum samykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

16. februar 1996 svaraði løgmaður soleiðis:

S v a r

1. Sambæt upplýsingum frá Føroya Fólaneti, Húsalánsgrunninum, Føroya Banka, Skráseting Føroya og Føroysku Sparikassunum vóru tilsamans 405 skip og fastar ognir seldar á tvingsilssølu í 1995. Av hesum vóru 212 tvingsilssølur sethús.

   Tá ið spurt verður, um landsstýrið ætlar at halda fast við hesa gongd so er svarið, at orsøkin til tað stóra talið av tvingsilssølum í 1995 er, at ikki fyrr í 1994 og 1995 sóust avleiðingarnar av fíggjarligu kreppuni á setbúsaøkinum. Upplýsast kann, at í 1994 vóru 201 setbús seld á tvingsilssølu.

   Sítandi landsstýrið hevur ikki skapað hendan sorgarleik.

   Tvørturímóti hevur landsstýyrið framt tleiri tiltøk, ið veruliga fara at hjálpa setbúseigarum.

   Fyri tað fyrsta er rentufrádrátturin fyri 1996 lækkaður úr 40% upp í 48%. Tað merkir ein skattalætta uppá umleið 25 mió. kr.

   Fyri tað mesta hevur landsstýrið virkað fyri umlegging av kommunuskuldini soleiðis, at meðalkommunuskattaprosentið í 1996 kann lækka 1,22% í meðal. Tað verður ein skattalætti uppá 30-35 mió. kr.

   Landsstýrið framdi eisini broytingar í skattalóggávuni stutt fyri jól í fjor. Broytingarnar føra við sær umleið 90 mió. kr. í skattalætta í 1996.

   Hetta skal eisini síggjast í sambandi við, at tær bægru inntøkurnar í 1995 fingu umleið 28 mió. kr. í skattalætta.

   Harumfram fer setbúsapakkin væntandi at føra við sær, at Føroya Banki fer at rentunullstilla 400 mió. kr., og Húsalánsgrunnurin 200 mió. kr. Við leinum rentunullstillingum, ið eru gjørdar frammanundan, verða sostatt umleið 750 mió. kr. rentunullstillaðar.

   Ikki kann sigast annað enn, at landsstýrið hevur framt tiltøk, ið fara at lætta um hjá setbúsaeinarum og føroyingum yvirhøvur.

2. Sambæt galdandi reglum skal landsstýrið góðkenna allar starvssetanir hjá tí almenna. Sambæt skjalum landsstýrisins hesum viðvíkjandi varð í 1995 givið loyvi til at seta 135 fólk í fast starv. Av hesum vóru 107,30 starv, har annað fólk var farið úr starvi, meðan 27,70 vóru nýskipað starv. Harumframt vóru 106,5 fólk sett í fyribils starv. Hetta eru avloysarar fyri fólk, sum fóru í ferin, ella av øðrari orsøk vóru úr starvi í styttri tíðarskeið.

Sum nevnt vóru 27,7 starv nýskipað. Nýskipanir vóru rettuliga javnt býttar til yvir fleiri almennar stovnar.

Nevnast kann, at í 1995 fingu Almannastovun 4 og Landsskrivstovan 3,5 nýskipað starv.

At almannastovuni leingi hevur manglað arbeiðsmegi, serliga aftaná at umsitingin av almannaverkinum varð yvirtikin, munnu flest verða greið um.

Nýskipanir á landsskrivstovuni eru fyrst og fremst á fíggjardeildini, ið er styrkt í sambandi við nýggju játtanarskipanina.

3. Viðvíkjandi spurningunum um landsstýrið ætlar at halda fast við hesa gongd er at siga, at í sambandi við at seinni partur av stýrisskipanarlógini um ráðharraábyrgd kemur í gildi á ólavsøku, verður neyðugt at fremja ávísar bygnaðarbroytingar í almenna fyrisitingini.

Tíðirnar broytast, og somuleiðis krøvini til tey, ið arbeiða í almenna fyrisitingini.

Landsstýrið hevur í samband við broytingarnar í almenna fyrisitingini fingið sakkona hjálp uttaneftir at standa fyri arbeiðnum.

Setningurin er at fáa almennu fyrisitingina at virka betri enn hígartil við effektiviserigum og rationaliseringum fyri minni kostnað.

Sigast kann, at hetta er fyrsta landsstýrið, ið hevur ein miðvísan politikk viðvíkjandi almennu fyrisitingini.

Landsstýrið hevur boðað frá, at sparingar skulu gerast á fíggjarlógini fyri umleið 300 mió. kr.

Landsstýrið ætlar ikki at økja almenna sektorin, men heldur at gera hann betri og billigari.

100-9 Fyrispurningur til Aksel Nolsøe, landsstýrismann, viðv. ígildisseting av lógunum um vinnuframa viðvíkjandi ígildisseting av lógunum um vinnuframa

Ár 1995, fríggjadagin 8. desember bøddi fimmaðurin frá søljálandi fyrispurningi frá løgtingsmonnunum Bjarna Djurholm og Óla Breckmann:

FYRISPURNINGUR

1. **Hvussu nógvar umsóknir um stuðul til vinnuframa eru innkomnar, síðan nýggju lógirnar um vinnuframa eru settar í gildi, og hvat er sum heild hent við hesum umsóknum?**

2. **Eru kunngerðir um ígildissetan av danskum stuðulsskipanum til vinnuframa ("Erhvervsfremme") lógliga lýstar smbrt. nýggju stýrisskipanini at galda fyri Føroyar?**

Viðmerkingar:

Nógvur almennur bávi hevur verið um royndir landsstýrisins at lynna fyri nýggjum vinnuvirkjum og arbeiðsplássum. Vit hava fingið:

1. Frontaksgrunnin,
2. Ábyrgdargrunnin.
3. Menning av fiskiveiði á landi,
4. Stuðul til nýggjar vinnur (28% lønariskoyti til útvald virki),
5. Grunnin til ídnaðarfremjandi endamál.

Harumfram høvdu og hava vit
6. Ídnaðargrunnin
7. Menningargrunnin
8. Føroya Banka
9. Sparikassarnar.

Eisini hevur nógv verið gjørt burturúr, at 23 ymsar danskar skipanir fyri vinnuframa hava fingið gildi fyri Føroyar.

Onkur føroysk umsókn er innsend, men havnað hóast vel undirbygd.

Eisini hevur blaðskriving verið um, at danski vinnuframmin hevur ikki løggildi í Føroyum, tí lýsingarnar hava verið á donskum máli í staðin fyri føroyskum og tí í stríð við nýggju stýrisskipanina.

11. december 1995 varð við 20-0-0 atkvøðum samykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.
17. januar 1996 svaraði Axel H. Nolsøe, landsstýrismaður soleiðis:

SVAR

1. Tær vinnuframaskipanir, ið eru í gildi, og sum játtan er til á fíggjarlógini ella í grunni, eru:

1) Stuðul til menning av fiskivinnu á landi.
2) Grunnurin til ídnaðarfremjandi endamál.
3) Stuðul til nýggjar vinnur.
4) Ábyrgdargrunnurin.

1) Stuðul til menning av fiskivinnu á landi.
Fyri 1995 eru útgoldnar 8,3 mió. kr. í studningi til innflutan frystan 3. lands fisk.

Til vørumenning eru játtanir givnar til verkætlanir til framleiðslu av reyktum laksavørum og til laksagóðskingarvirki.

2) Grunnurin til ídnaðarfremjandi endamál.
Í 1995 eru givnar 15 játtanir úr grunninum til ídnaðarfremjandi endamál. Flestu verkætlanir fara í gongd beinnvegin, og frágreiðing og eftirmeting verður gjørd.

3) Stuðul til nýggjar vinnur.
Í 1995 vóru 10 játtanir givnar. Av hesum vóru 5 til fiskiskip, 2 til fiskiídnað, 1 til skipasmiðju, 1 til snikkaravirki og 1 til EDV-tænastufyritøku, 4 verkætlanir eru larnar í gongd, og útgoldnar er 1,1 mió. kr. í lønarendurgjaldi.

4) Ábyrgdargrunnurin.
Við árslok 1995 vóru 7 umsóknir innkomnar og ein afturtikin. Stýrið fyri Ábyrgdargrunnin hevur biðið lánar umsøkjararnar um nærri upplýsingar, og svar er ikki komið enn, so eingin umsókn eer avgreidd. Hóast grunnurin varð stovnaður í 1994 hevur leingi verið ógreitt, hvussu hann skal umsitast, men í oktober 1995 eru reglurnar um virksemi Ábyrgdargrunsins lýstar í kunngerð, og endaligt umsóknarblað er samtykt.

Danskar vinnuframaskipanir.
Haraftrat koma tær dansku vinnuframaskipanirnar. Hesar komu í gildi í Føroyum í september 1995, og 12. oktober 1995 vóru umboð fyri danska lívhetvsfrembnestyrelsen í Føroyum og kunnaðu seg um skipanirnar.

Tað tekur altíð tíð hjá vinnuni at seta seg inn í slíkar nýggjar skipanir, og tí eru ikki nógvar umsóknir komnar til hesar enn.

2. Løgtingið hevur 22. mai 1995 samtykt løgtingsmál nr. 129/1994: Ígildisselan fyri Føroyar av lóg "om erhvervsfremme" sambært "Anordning om ikrafttræden på Færøerne af lov om erhvervsfremme". Lógin varð lýst í Kunngerðablaðnum B tann 22. september 1995, og fekk gildi dagin eftir.

Við tað at løgtingsmálið er samtykt 22. mai 1995, og nýggja tingskipanin fekk gildi ólavsøkudag 1995, er lógin lógliga lýst í Føroyum, uttan mun til hvat stendur í § 52 í tingskipanini.

100-10 Fyrispurningur til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, viðv. skattaviðurskifti føroyska sjómanna

Ár 1995, týsdagin 12. desember boðaði formaðurin frá soljóðandi fyrispurningi frá Tordi J. Niclasen, løgtingsmanni:

FYRISPURNINGUR

Hvat meinar landsstýrið kann gerast, fyri at familjur hjá føroyskum sjómonnum við t.d. norskum skipum, av skattligum ávum ikki eisini noyðast at flyta av landinum?

Hevur landsstýrið ávísar ætlanir, nær verða hesar so settar í verk?

Hvørjar ætlanar hevur landsstýrið um broytingar í skattalógini við atliti til, at fiskimaðurin á føroyskum kjøli kemur undir lagaligari skatting?

Viðmerkingar:

Í hesum arbeiðsloysistíðum eru tað fleiri føroyingar, sum hava leita sær uttanlanda.
Ikki so fáir av hesum eru fiskimenn, sum eru farnir t.d. til Noregs.
Hjá familjumonnum er tað í stóran mun soleiðis, at familjurnar verða eftir í Føroyum.
Hóast sjómaðurin sjálvur flytir bústað, verður hann skattaður sum búgvandi í Føroyum. Hetta, tí familjan framvegis býr her.
Sostatt er hesin familjumaður fyri skattligum vanbýti í mun til sínar norsku starvsfelagar, sum eru undir aðrari skattskipan.

Norskir sjómenn verða roknaðir sum sjómenn burturav, um so er, at teir eru mynstraðir minst 20 vikur árliga. Hetta gevur teim rætt til ein serligan sjómansfrádrátt, sum er 70.000 kr.árliga, um so er at inntokan av sjónum er minst 220.000 kr.; er hon minni, lækkar frádrátturin. Tá fáa teir ein serligan sjómansfrádrátt uppá 70.000 kr. Hetta er eisini galdandi fyri eitt nú stakar føroyingar , sum taka sær fastan bústað í Noreg.

Lítið hugaligt er tað - fyrst at fara av landinum - og at vera við fiskifari, har utlendsku arbeiðsfelagarnir hava uml. 70% eftir, meðan hin gifti føroyingurin bert hevur eini 45% eftir í sín part.

Eina og alleina, tí familjan er eftir í Føroyum.

Hvat skattaviðurskiftum norska sjómanninsins annars viðvíkur, verður lýst sum niðanfyristandandi, har eisini samanborðið verður við annan lønmóttakara við eini ársløn uppá kr. 250.000:

Alt í 1.000 kr	*Sjón.*	*Lønt.*
Inntøka	*250*	*250*
Skatt på personindteki:		
Folkeryggl - 7,8%	*20*	*20*
Toppskatt: 26.500 kr. x 9,5%	*3*	*3*
Toppskatt: 15.500 kr. x 13,7%	*2*	*2*
Skatt på personinntekt ialt	*24*	*24*
Skatt på almennelig inntekt:		
Bruttoinnekt	*250*	*250*
Klassefradrag	*23*	*23*
Minstefradrag	*28*	*28*
Serfradrag fyr fiskere	*70*	
Renteudgiftir	*30*	*30*
Almennelig inntekt	*99*	*169*
Skatt på almennelig inntekt - 28%	*28*	*47*
Skatt ialt	*52*	*72*
Skattur í % av inn.	*21*	*29*

Hvat viðurskiftum teirra viðvíkur, sum sigla við Kanadiskum fari, seta mynduteikarnir bar ta treyt, at útlendingar(incl. føroyingar) skulu verða fastbúgvandi har fyri at kunna arbeiða (immigrantur).

Føroyingar eru sostatt skrásettir sum borgarar í Kanada, men við øðrum ríkisborgarretti.

Føroyska skattavaldið heldur seg tó til, at hesir **eisini** eru føroyskir skattaborgarar. Hetta tí familjan er í Føroyum. Sostatt krevur føroyska skattavaldið inn munin millum kanadiskan skatt og føroyskan.

Felagið Føroyskir Fiskimenn Uttanlands hava stødugt gjørt vart við hesi viðurskifti og vist á avleiðingarnar av verandi skipan.

M.a hava teir ført fram, at verða broytingar ikki framdar, so kann tað hava (hevur havt) hesar avleiðingar:

1.**Familjan flytir av landinum.** Hetta er tíðarverri nakað sum er sjón fyri sogn - ein menniskjaligur og sosialur sorgarleikur, sum eisini hevur hesar avleiðingar:
* skattainntøkurnar, sum landskassin hevur av tí útisiglandi fellur heilt burtur.
* møgulig skattainntøka, sum hjúnarfelagin í dag rindar til lands- og kommunukassa, fella heilt burtur.
* MVG-inntøkna, sum landskassin hevur av útlendsku inntøkuni fellur heilt burtur.
* ringávirkanin, sum útlendska inntøkan hevur við sær í Føroyum, fellur burtu.

2. **Sundurlesing/hjúnarskilnaður.** Fyrst verður fram, at hetta er eisini nakað, sum er sjón fyri sogn. Maðurin "kveltir" sambandið við Føroyar í tann mun tað er neyðugt fyri at tað kann vera forsvartigt fíggjarliga at fara av landinum.

Umframt omanfyrinevndu avleiðingar, kann slík "loysn" eisini hava teir avleiðingar at.

* um so skuldi verið, at konan ikki megnar at uppihalda sær og børnunum, so fellur uppihaldsskyldan yvir á tað almenna í tann mun uppihaldspeningurin til fyrverandi hjúnarfelaga og børn ikki strekkir til, tá maður og kona ikki longur hava uppihaldsskyldu mótvegis hvørjum øðrum.

3. **Gevast at arbeiða uttanlands.** Verður avgerðin um at gevast at verða við fiemmandum fiskiskipi tiknin, so kemur føroyskisamfelagshúskapurin at missa inntøkur, sum konna uttanelfir. Hetta hevur m.a. hesar avleiðingar.at:
* at skattainntøkan, sum lands-og kommunukassin hava fingið frá teim útisiglandi, fellur burtur.
* at møguleiki er fyri, at viðkomandi - heldur enn at føra inntøkur til landið - kemur undir ALS skipanina

ella undir Forsorgarhjálp
* at MVG inntøkurnar, sum landskassin hevur av útlendsku inntøkuni fella heilt burtur
* ringvirkanin, sum útlendka inntøkan hevur við sær í Føroyum, fellur burtur.

Spyrjarin kann ikki annað enn verða samdur við sjónarmiðum teirra, sum staðiliga hava gjørt myndaleikarnar varðugan við hesi viðurskifti.
Ásannast má, at skeivt er at lata standa til og tí eiga hesi viðurskifti at fáa eina politiska viðgerð.

Einki at ivast í, at linkar skattatrýstið á fiskimenn við føroyskum eins og við útlendskum skipum, so kemur tað m.a at hava ávirkanina, sum Felagið Føroyskir Fiskimenn Uttanlands fyri stuttum hava víst á:

* at fleiri velja at verða verandi í Føroym og ávikavíst flyta heimaftur at búgva, soleiðis, at **skattagrundarlagið økist** og harvið eisini møguleikin fyri hægri skattainntøkum, hóast linari skatting.

* at føroyska samfelagið fær **fleiri útlendskar inntøkur í umfar.**

* at menn av føroyskum fiskiskipum ikki rýma, so at **kvalifikatións-struktururin** í føroysku fiskivinnuni - og harvið kappingarføri - ikki avlagast óneyðugt.

Politikkur, sum beinleiðis er orsøk til, at fólk flytur av landinum er alt annað enn skilagóður.

Vísandi til omanfyrt nevndu viðmerkingar, kann av rottum spyrjast, hvat samfelagsliga er vunnið við eini skipan, sum soleiðis í ólukku mát ger støðu fiskimannsins sera trupla - ja, so trupla, at einasta gongda leið, er at stinga í posan og fara av landinum.
Familjan er farin - og við teimum, tann inntøka, sum hetta samfelag so harðliga hevur fyri neyðini.

Fyri at fáa greiði á, hvørjar ætlanir landsstýrið hevur á hesum øki verður spurningurin reistur.

13. december 1995 varð við 16 3 0 atkvøðum varð samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

30. januar 1996 svaraði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður soleiðis:

SVAR

Fyrstu tveir spurningarnir snúgva seg um skattaviðurskiftini hjá føroyskum sjómonnum við útlendskum skipum, meðan tann seinasti snýr seg um somu viðurskifti hjá teimum sjómonnum, sum eru við føroyskum skipum.

Tað er ein greiður politiskur málsetningur at ava eina skattaskipan, sum viðger borgarar landsins eins, og hetta er eisini málsetningurin hjá sitandi landsstýri.

Landsstýrið fær javnan áheitanir og ynski frá ymiskum áhugabólkum í samfelagnum um at gera serreglur fyri júst teirra øki. Landsstýrið skilir hesa áhietanir, men hevur ikki kunnað gingið teimum á møti, grundað á meginregluna um at viðgera allar landsins borgarar eins.

Tað, at føroyingar arbeiða saman við borgarum í øðrum londum, har skatturin er minni enn hjá okkum, t.d. Norra, ella kanska eisini í londum, har als eingin skattur er, eigur ikki at ávirka føroysku skattaskipanina.

Sum sagt, skilir landsstýrið hesar persónar og bólkar, sum venda sær til politikarar, men eg við hervið heita á allar politikarar, um í staðin fyri at lata fyri at gera serreglur, beldur at hjálpa landsstýrinum við at greiða borgarunum frá tí týdningarmikla í at hava eina skattalóg, ið viðger allar borgarar so eins sum gjørligt.

Nevnast kann, at broytingar eru gjørdar í skattalógini fyri ikki so langari tíð síðanni, sum tryggja, at føroyingar, sum búgva í Føroyum, men sigla við útlendskum skipum, fáa frádrátt fyri ferðakostnaðin til og frá skipinum. Somuleiðis er lóg samtykt, ið tryggjar langfaraliskimonnum frádrátt fyri tær inntøkur, sum fara til at tryggja teirra inntøkugrundarlag, soleiðis at teir verða javn stillaðir við aðrar borgarar, ið búgva í Føroyum.

Til seinast verður spurt: "Hvørjar ætlanir hevur landsstýrið um broyting í skattalógini vi atfini til, at fiskimaðurin á føroyskum kjøli kemur undir fagaligari skatting"?

Her kann fyrst vísast til svarið uppá teir fyrstu tveir spurningarnar. Hartil kann viðmerkjast, at ein lækking av skattinum hjá fiskimonnum, uttan at skatturin hjá øðrum borgarum verður lækkaður, er tað sama sum at veita fiskimonnunum studning. Landsstýrið er av teirri áskoðan, at hesin spurningur ikki eigur at blandast inn í skattalógina, men eigur at viðgerast sum tað, hann í veruleikanum er, ein spurningur um stuðul til føroyskar fiskimenn.

Til seinast skal tó viðmerkjast, at skattalættin, ið kom í gildi við ársbyrjan, sjálvsagt hevur lætt nakað um viðurskiftini, hesi fyrispurningur viðger.

100-11 Fyrispurningur til Andrias Petersen, landsstýrismann, viðv. arbeiðsleysum og forsorgarstuðuli.

Ár 1995, mikudagin 20. desember boðaði formaðurin frá soljóðandi fyrispurningi frá Kristiani Magnussen, løgtingsmanni:

FYRISPURNINGUR

Er landsstýrismaðurin greiður yvir tann menniskjaliga og samfelagsliga vandan, at nakrir borgarar í landinum í fleiri ár hava verið fangaðir í eini fátækrafellu?

Í samgongusemjuni um skattalætta verður eisini ískoyti til ávísar pensiónistar hækkað munandi í 1996. Ætlar landsstýrismaðurin í almannamálum, at tey arbeiðsleysu við lægstu inntøkunum fáa lut í betruðu fíggjarligu korunum í 1996?

Um landsstýrismaðurin ætlar at gera tær broytingar í forsorgarlógini, hann hevur boðað frá, at hann fer at gera. Hvussu leingi, metir hann, at tey, ið hava hesa broyting fyri neyðini, skulu bíða eftir henni?

Viðmerkingar:

Líka síðani 1. august 1992, tá forsorgarlógini í samband við fíggjarligan stuðul vegna arbeiðsloysi varð broytt, hava tey arbeiðsleysu, ið liva av forsorgarstuðuli, eftir mínum tykki verið fyri lógarásettum vanbýti. Bæði løgting og landsstýri eiga at skipa lógirnar í samfelagnum soleiðis, at øll, ið liva av forsorgarstuðli, eru líka fyri lógini.

Landsstýrismaðurin í almannamálum hevur givið til kennar bæði fyri mær og eisini alment, at hann prinsipielt er samdur í, at ávís arbeiðsleys liggja á einum ov lágum fíggjarligum støði til, at tey at kunnu lívbjarga sær á sømiligum fíggjarligum støði.

Landsstýrismaðurin hevur eisini fleiri ferðir boðað frá, bæði á pressufundi og í øðrum sambandi, at forsorgarlógin verður broytt. Hetta er eisini endurgivið í fjølmiðlunum. Í viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið fyri 1996 undir § 17: Arbeiðsmarknaður stendur m.a.: "Landsstýrið er júst nú í ferð við at endurmeta ta forsorgarskipan, sum er galdandi fyri arbeiðsleys, og er endamálið við hesum at tryggja øllum teimum, **sum fara úr** skipanini, rímilig kor."

Tann 7. januar 1996 fara tey fyrstu úr arbeiðsloysisskipanini orsakað av líðaravmarkingin, ein kann fáa útgjald. Enn er einki lógaruppskot um broyting av forsorgarlógini komið frá landsstýrismanninum.

22. december 1995 varð við 15-10-4 atkvøðum varð samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

2. februar 1996 svaraði Andrias Petersen, landsstýrismaður soleiðis:

SVAR

Í samband við stovnsetanina av Arbeiðsloysisskipanini og at útgjaldingin av arbeiðsloysistrygging byrjaði 1. august 1992, vórðu samstundis broytingar framdar í forsorgarlógini, soleiðis at veitingar vegna arbeiðsloysi vanliga hægst kunnu verða samsvarandi grundupphæddini til pensionistar og aftrat barnaviðhótin.

Støðið undir hesum var fyrst og fremst, at arbeiðsloysistryggingin upprunaliga var ætlað at vera ein sjálvboðin skipan. Sum øll vita, varð arbeiðsloysistryggingi tá ið avlornaði, stovnsett sum ein tvungin skipan.

Tíðarskeiðið ein kann fáa útgjald frá Arbeiðsoysisskipanini er nú 3 ár og 2 mánaðir í einum 4 ára skeiði, og hevur landsstýrið ikki ætlanir um at leingja tíðarskeiðið, sum nú er.

Sostatt hevur eitt stórt tal av arbeiðsleysum frá byrjanini av hesum árinum bert veitingarstøðið eftir forsorgarlógini at dúva uppá, og eru nógv av teimum, sum støðan á arbeiðsmarknaðinum nú er, uman veruligan møguleika fyri at útvega sær arbeiðsinntøku/útrokningargrundarlag til attur at fáa útgjaldingar frá Arbeiðsloysisskipanini.

Ásannandi hesa støðu, er so at siga enn minni grundarlag fyri at varðveita tvinni sløg av forsorgarhjálp, forsorgarhjálp vegna arbeiðsloysi og aðra forsorgarhjálp, og er tað nú ætlanin áðrenn seinasta framløgudag í hesi tingsetuni, at kunna leggja fyri løgtingið uppskot um broyting í forsorgarlógini, ið stillar móttakarar av fyribilshjálp eftir § 9 í forsorgarlógini javnt, uttan mun til, hvør orsøkin er til, at søkt verður um hjálp.

100-12 Fyrispurningur til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, viðvíkjandi lýsingini av sínámillum peningarenslinum millum Føroyar og Danmark

Ár 1996, týsdagur 30. januar boðaði formaðurin frá soljóðandi fyrispurningi frá Bjarna Djurholm, løgtingsmanni:

FYRISPURNINGUR

Føroya Løgting álegði 31. mai 1995 landsstýrinum at seta trímannanevnd at kanna og útgreina peningarenslið millum Føroyar og Danmark.

1) Hevur landsstýrið viðgjørt viðtikna uppskotið til samtyktar og viðmerkingarnar í álitinum, sum eru grundarlagið undir uppskotinum og við støði í hesum sett kanningarsetningin upp?

2) Er kanningarnevndin sett, og hvør mannar hana?

Viðmerkingar:

8. mars 1995 legði Fólkaflokkurin fyri Føroya Løgting uppskot til samtyktar nr. 90/1994: **Lýsing av sínámillum peningarenslinum millum Føroyar og Danmark.**

Uppskotið var soljóðandi:
Føroya Løgting heitir á landsstýrið at seta trímannanevnd av húskapar- og fíggjarkønum fólki at greina og lýsa sínámillum peningarenslið millum Føroyar og Danmark. Úrslitið skal leggjast fyri løgtingið á ólavsøku 1995.

Úrslitið av hesum uppskoti var, at meirlutin í fíggjarnevndini víðkaði kanningarsetningin og setti nýtt uppskot fram:

Álagt verður landsstýrinum at seta trímannanevnd av búskaparkonum fólki at skipa fyri útgreining og lýsing av peningarenslinum millum Føroyar og Danmark og útgreining og lýsing av ávirkanini av blokkveitingini á føroyska búskapin. Úrslitið av kanningini verður lagt fyri løgtingið í seinasta lagi 1. okt. 1996.

Løgtingið avgreiddi málið 31. mai 1995, og varð uppskotið samtykt við 22-1.

Í fíggjarnevndarálitinum verður dentur lagdur á nogdina av ósvaraðum spurningum í sambandinum millum Føroyar og Danmark, og mælt verður tí til at viðka kanningarsetningin.
Spurningarnir, sum drígnir verða fram í álitinum, eru hesir:

1) Hvørja ávirkan hevur blokkstøðulin á føroyska búskapin?
2) Hvussu ávirkar blokkstøðulin skattainntøkurnar hjá landinum (beinleiðis og óbeinleiðis)?
3) Hvør er multiplikatoreffektin av veitingini?
4) Hvussu ávirkar blokkstøðulin kappingarførið hjá vinnuni?
5) Hvussu ávirkar blokkstøðulin almenna sektorin og aðrar partar av vinnulívinum (t.d. privatu handils- og tænastuvinnuna)?
6) Hvussu ávirkar blokkurin talið av arbeiðsplássum?
7) Hvørjir fyrimunir og vansar standast av møguligari kapitalisering av blokkinum?

Samanumtkið verður mælt til at lýsa positivar og negativar avleiðingar av blokkinum.

Síðan uppskotið til samtyktar varð lagt fyri løgtingið í fjor, hevur áhugin fyri og umtalan um føroysk viðurskifti verið áhaldandi.

Tað, sum tíverri ofta hevur eyðkent umtaluna, eru tær einveyis og ofta skeivu upplýsingarnar, sum borgar verða fjøldini. Hesar upplýsingar eru so tað støðið, sum danir byggja sína fatan á, nevniliga, at vit burturav eru ein útreiðsla fyri danska skattgjaldaran.

Saman við vantandi innlitt sum heild um fíggjarliga renslið millum rikispartarnar, vilja skeivu upplýsingarnir skaða fatanina um samstarvið millum Føroyar og Danmark soleiðis, at torfort er at fáa skilagóðar loysnir á rikisrettarligu støðuni og bindingunum landanna millum.

Tað er tí neyðugt, at fíggjarliga støðan og peningarenslið verður lýst á sakligum grundarlagi.

Í samsvari við hendu veruleika, legði Fólkaflokkurin fyri løgtingið 8. mars 1995 uppskot um at fáa hesi viðurskifti kannað og lýst.

Hetta er eitt álvarsmál og hevur tí sjálvsagt samsvarandi áhuga. Tí eigur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum at greiða tinginum frá, hvat higartil er spurt úr kanningararbeiðnum.

Víst verður annars til viðmerkingarnar í uppskoti Fólkafloksins nr. 90/1994.

31. januar 1996 varð við 22-0-0 atkvøðum varð samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

7. mars 1996 svaraði Hjannes Eidesgaard, landsstýrismaður, soleiðis:

SVAR

9. mars 1995 leggur Bjarni Djurholm, løgtingsmaður vegna fólkaflokkin fram løgtingsmál nr. 90/94, sum er soljóðandi uppskot til samtyktar:

"Føroya Løgting heitir á landsstýrið um at seta trímannanevnd av búskapar- og fíggjarkonum fólki at greina og lýsa sínámillum peningarenslið millum Føroyar og Danmark. Úrslitið skal leggjast fyri løgtingið á ólavsoku 1995."

Málið verður eftir 1. viðgerð 21. april 1995 beint í fíggjarnevndina.

Í álitinum frá fíggjarnevndini dagfest 17. mai 1995 sigur ein meirihluti, at hann ikki tekur undir við øllum viðmerkingunum frá uppskotsstillaranum, men heldur tað tó vera rætt at kanna peningarenslið millum Føroyar og Danmark. Sami meirihluti ásannar, at nógvir ósvaraðir spurningar eru í samskiftinum við danska statin og mælir tí til, at setningurin hjá kanningarnevndini verður víðkaður.

Meirihlutin setir soljóðandi uppskot til samtyktar fram:
"Álagt verður landsstýrinum at seta trímannanevnd av búskaparkonum fólki at skipa fyri ingreining og lýsing av peningarenslinum millum Føroyar og Danmark og útgreining og lýsing av ávirkanini av blokkveitingini á føroyska búskapin. Úrslitið av kanningini verður lagt fyri løgtingið í seinasta lagi 1. oktober 1996."

Løgtingið avgreiðir málið 31. mei 1995, og uppskotið frá meirihlutanum í fíggjarnevndini verður samtykt við 22-[illegible] atkvøðum.

Undir 1. viðgerð av málinum mælti eg til, at nýggja búskaparráðið fekk hesa uppgávu.

Báðir minnihlutarnir í fíggjarnevndini mæla til tað sama, og í uppskotinum frá meirihlutanum er einki, sum beinleiðis fordar fyri, at búskaparráðið átók sær arbeiðið.

Á leið um sama tíð verður nýggj lóg um búskaparráð samtykt. Lógin er staðfest 12. juli 1995.

Í grein 2 stendur at ráðið skal hava 5 limir, sum landsstýrið setur eftir tilmæli frá setursráðnum á Fróðskaparsetrinum. Formaðurin og tveir av limunum skulu hava útbúgving sum búskaparfrøðingar, men hesir tríggir mugu ikki hava leiðandi støv innan miðfyrisitingina og mugu ikki umboða serhugamál í dagligu starvi sínum.

Í grein 3, stk. 4 verður sagt, at ráðið kann gera avtalu við stovnar/persónar um hjálp til kanningararbeiði fyri ráðið.

Kravið um, at búskaparfrøðingarnir ikki mugu hava leiðandi støv innan miðfyrisitingina hevur gjørt, at sera trupult hevur verið at manna ráðið.

Eisini verður í hesum dømum allur almenni bygnaðurin umskipaður, og ikki fyr enn einaferð seinni í ár her til at siga, í hvørjari fyrisiting mógvir av okkara búskaparfrøðingum sita.

Ein møguleiki kundi sjálvsagt verið at mæla løgtinginum til broyting í grein 2, stk. 1 í løgtingslóg um búskaparráð, men hin vegin verður uttan iva neyðugt at siggja, hvussu nýggi almenni bygnaðurin verður.

Við hesum grundgevingum hevur landsstýrið enn ikki valt nýtt búskaparráð, men okkum stendur frítt at ráðføra okkum við "gamla" búskaparráðið, eins og vit kunnu fáa teirra viðmæli av ymiskum spurningum. Í "gamla" búskaparráðnum sita: Sigur Poulsen, stjóri í Landsbanka Føroya, Bjarni Olsen, stjóri á Hagstovu Føroya og Kári Petersen, deildarstjóri á búskapardeildini í landsstýrinum.

Í samráð við "gamla" búskaparráðið hevur landsstýrið latið Landsbanka Føroya løgtingsmál nr. 90/1994. Við øðrum orðum er arbeiðssetningurin úppskotið til samtyktar frá meirihlutanum í fíggjarnevndini. Men við málinum eru eisini upprutaðuppskotið frá Bjarna Djurholm, álitið frá fíggjarnevndini og fyrispurningurin og svar í løgtingsmáli 180-12/1995. Landsbankin er farin undir útgreiningar og lýsingararbeiðið av peningarenstinum millum Føroyar og Danmark og av ávirkanini av blokkveitingini á føroyska búskapinum.

Tá ið Landsbankin er liðugur við tann analysiska og frágreiðandi partin, verður alt málið lagt fyri "gamla" búskaparráðið, sum síðan skal viðgera og góðkenna endaligu frágreiðingina, sum síðan verður lagd fyri løgtingið í september í ár.

Við hesum er vónandi fyrispurningurin frá Bjarna Djurholm noktandi svaraður

100-13 Fyrispurningur til Ivan Johannesen, landsstýrismann, viðvíkjandi fløgustuðuli til trolara sambært løgtingslóg um stuðul til feskfiskaflotan

Ár 1996, fríggjadagin 2. februar boðaði formaðurin frá soljóðandi fyrispurningi frá Jógvan á Lakjuni, løgtingsmanni:

FYRISPURNINGUR

Vísandi til løgtingslóg um stuðul til feskfiskaflotan frá 4. mars 1993 og broyting til sama lóg frá 30. mai 1994 verður landsstýrismaðurin biðin um at greiða Føroya løgtingi frá, hvussu tað ber til, at bert 1 skip í bólki 2 undir § 3 í lógini (lemmatrolarar frá 1976 og eldri), og, sum skilst, tað einasta av øllum teim nógvu skipunum, ið eru umfatað av lógini, nevniliga M/tr. "Boðasteinur", fyrrverandi "Roc Amadour", ikki kann fáa fløgustuðul sín útgoldnan.

Viðmerkingar:

Tann 31. januar í ár setti eg heinda fyrispurningin til landsstýrismannin í fiskivinnumálum. Landsstýrismaðurin svaraði tá, at hann ikki kundi svara fyrispurninginum munnuliga og heitti á meg um at seta hann fram skivliga. Tað verður hervið gjørt.

Í mars í 1993 samtykti løgtingið lóg um stuðul til feskfiskaflotan. Henda lóg hevði til endamáls at umleggja ein part av tí stuðuli, sum áður hevði verið latin feskfiskaflotanum sum prísískoyti o.a. til ein tíðaravmarkaðan fløgustuðul.

Í § 3 í hesi lóg og í broyting til sama lóg frá 30. mai 1994 eru skipini, ið skulu fáa fløgustuðul, býtt í 14 bólkar, og tilsamans eru eini 140 skip og bátar umfatað av lógini.

Í bólki 2 undir § 3 í lógini eru 5 lemmatrolarar frá 1976 og eldri. Ein av hesum trolarum var "Roc Amadour", nú "Boðasteinur". "Boðasteinur" varð keyptur til Fuglafjarðar í 1994 og er skrásettur hjá Føroya Skipaskráseting tann 1. november sama árið.

Av tí at eigararnir halda seg hava rætt til fløgustuðul, hava teir fleiri ferðir søkt um at fingið hann útgoldnan. Men landsstýrið hevur svarað, at heimild er ikki at flyta fløgustuðulin.

Sambært § 5, stk. 2 í tí upprunuligu lógini frá 4. mars 1993 kundi landsstýrið - eftir umsókn - loyva, at tað, sum eftir var av stuðulinum, varð goldið nýggjum eigara, tá ið eigaraskifti fór fram. Men eftir broytingini í nevndu § frá 30. mai 1994 hevur nýggjur eigari krav upp á at fáa fløgustuðulin fluttan.

Eigaraskiftið í sambend við "Boðastein" er farið fram, eftir at broytingin í nevndu løgtingslóg er komin í gildi, og tí átti tað at verið heilt greitt, at teir hava krav upp á fløgustuðulin.

Vísast kann eisini á, at trolarar í sama stóðu sum "Boðasteinur" og eisini í sama bólki, hava fingið fløgustuðul fluttan, hóast eigaraskifti er farið fram, áðrenn nevndu broyting í lógini.

Í øllum førum er tað sera løgið, at eftir øllum at døma bert eitt skip av øllum, sum eru umfatað av lógini, ikki skal fáa fløgustuðul sín fluttan.

Hetta er eitt prinsipielt mál, og tí verður fyrispurningurin settur fram.

7. februar varð við 24-2-í atkvøðum vatt samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

25. mars 1996 svaraði Ivan Johannesen, landsstýrismaður soleiðis:

SVAR

Íløgustuðul til feskfiskaflotan yvir 20 BRT verður latin samb. løgtingslóg nr. 34 um stuðul til feskfiskaflotan frá 4. mars 1993 við seinni broytingum. § 5 stk. 2 í upprunalógini sigur: "Tá ið eigaraskifti fer fram, kann landsstýrið - eftir umsókn - loyva, at tað, sum eftir er av stuðlinum, verður goldið nýggja eigaranum". Tá verandi landsstýrið vildi ikki fara í holt við at viðgera einstakar umsóknir hesum viðvíkjandi og avgjørdi tí við samtyktum 15. juni, 13. juli og 27. juli 1993, at stuðulin hjá feskfiskaførum í bólkunum 1, 3, 6, 4, 5, 10, 11, 12 og 14 samb. § 3 í lógini, skuldi flytast nýggja eigaranum við eigaraskifti. Hesar samtyktir vóru at skilja soleiðis, at um feskfiskafar í bólkunum 2, 7, 8, 9 og 13 samb. § 3 í lógini skifti eigara, so misti fiskifarið stuðulin.

Boðasteinur (fyrrv. Roc Amadour), sum er í bólki 2 samb. § 3 í lógini, varð seldur á tvingsilssølu 5. mai 1994. Við hesum fór eigaraskifti fram og skipið misti við hesum stuðulin.
Undan tvingsilssølumi høvdu fleiri áhugaðir keyparar, haruppií teir, sum seinni keyptu skipið á tvingsilssølumi 5/5-94, skrivliga fingið boð úr landsstýrinum, at skip í bólki 2 eftir fastari siðvenju ikki eftir eigaraskifti vildu fáa útgoldið tað, ið eftir var av íløgustuðlinum. Hetta var seinni, aftaná keypið, skrivliga gjørt keyparanum greitt enn einaferð.

19. mai 1994 samtykti løgtingið broytingar í lógini um "íløgustuðul". Ein av broytingunumm var, at íløgustuðulin verður fluttur nýggju eigarunum uttan undantak, broytingin í lógini varð lýst 8. juni 1994 og fekk gildi dagin eftir. Vegna tað, at "Roc Amadour" longu tá hevði mist stuðulin, varð eingin stuðul at flyta nýggja eigarunum, og vóru keyparamir sambært omanfyristandandi greiðir yvir hesum.

100-14 Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann, viðv. málinum um Norðurhøv og Norðuratlantshav

Ár 1996, mikudagin 7. februar boðaði formaðurin frá soljóðandi fyrispurningi frá Finnboga Ísaksen, løgtingsmanni:

FYRISPURNINGUR

1) **Hvat hevur landsstýrið gjørt í málinum um Norðurhøv og Norðuratlantshav, sum løgtingið samtykti 1. juni 1995?**

2) **Um landsstýrið ikki hevur kallað saman til tann í samtyktini nevnda fund, mer verður hetta so gjørt?**

Viðmerkingar.

1. juni 1995 samtykti løgtingið við 18 atkvøðum soljóðandi uppskot til samtyktar:
"Løgtingið áleggur landsstýrinum at fáa fund í lag millum teir suverenu statirnar Kanada, Ísland, Noreg og Rusland og tey sjálvstýrandi londini Føroyar og Grønlandi við hesum endamáli:

1) Londini lýsa sín felags ognar- og yvirvaldsrætt til havleiðirnar uttan fyri verandi 200 fjórðinga fiski- og búskaparmørk í Norðurhøvum og tí partinum av Norðuratlantshavi, sum hesi lond liggja í ella at
2) Londini skipa ein felagsskap at umsita alt lív - fisk, skeljadýr, plantur, hval, kóp og fugl - á hesum havleiðum.
3) Felagsskapurin avger einsamallur, hvat, hvussu nógv og hvør kann veiða á hesum leiðum.
4) Tá veiðunøgd verður ásett, skal grundarlagið fyri ásetingini vera tann týdningur, sum veiðan hevur fyri tann samlaða búskapin í nevndu londum."

Í viðmerkingunum til uppskotið til samtyktar varð ma. sagt:

"Týdningurin av og áhugin fyri fiskiskapi uttan fyri fiskimørkini er vaksandi. Fleiri millumtjóða felagsskapir eru, sum geva tilmæli um veiðu á hesum leiðum. Nevnast kunnu NAFO, sum "umsitur" fiskiskap í útnyrðingspartinum av Atlantshavi, IWC, sum "umsitur" stórhvalaveiðu um allan heim, og NAMMCO, sum er hvalafelagsskapur millum lond í Norðuratlantshavi.

Hesi seinastu árini er tað vorðið alsamt greiðari, at hesir felagsskapir antin ikki virka út frá nøktandi sjónarmiðum (IWC) ella ikki eru førir fyri at umsita tað, teir eru ætlaðir til (NAFO).

Eitt dømi er, at IWC "umsitur" stórhvalaveiðuna ikki út frá vísindaligum, men umhvørvisligum (djóraverndarligum og djóravinarligum) sjónarmiðum og als ikki á ein slíkan hátt, sum hvalaveiðutjóðir út frá vísindaligum sjónarmiðum halda, at stórhvalaveiðan eigur at vera umsitin.

Annað dømi er fiskiskapur í Loynikrókinum og úti fyri Kanada. Í Loynikrókinum fiska fyri stóran part skip, sum høyra heima ella eru skrásett í fjarum londum, ið onki hava við henda fiskiskap at gera uttan at vera skrásetingarlond. Skip, skrásett í td. Føroyum, kunna ikki vera við í fiskiskapinum, tí aðrar avtalur binda.

Kanada hevur júst havt eitt stríð við ES um svartkalvaveiðu uttan fyri 200 fjórðingar. Tann niðurfisking av fleiri fiskastovnum, sum serliga Spania og Portugal hava framt, hevur havt ólukkuliga ávirkan á fiskiskapin hjá millum øðrum ný fundlendingum og føroyingum. Stríðið millum Kanada og ES endaði við, at Kanada fær størri ræði yvir havleiðunum uttan fyri 200 fjórðingar.

Í Irmingarhavinum er framvegis óskerd veiða, men tað er bert ein spurningur um tíð, til kvotur eisini verða ásettar har. Verða søgulig veiðutøl nýtt sum grundarlag fyri kvotunum er vandi fyri, at fjarskotin lond, td. Japan, fara at fáa ríkiliga kvotu, meðan td. føroyingar fáa lítla kvotu.

Hesi fáu dømi eru góð prógv um, at um verandi gongd heldur fram, gerast summar tjóðir vinnarar, eisini tjóðir sum ikki búgva her um leiðir, og aðrar verða taparar, teirra millum føroyingar."

Síðani uppskotið varð lagt fram og samtykt, er ST-ráðstevnan um havrættin uttan fyri galdandi fiskimørk endað. Niðurstøðan á fundinum var, at strandalondini skula hava ávís rættindi at taka skip í havn, sum fiska ólógliga uttan fyri fiskimark, men ikki at doma tey, burtursæð frá sínum egnu skipum. Flagglandið hevur framvegis skylduna at draga skipini fyri rættin.

Um okkara leiðir hevur sildastríðið millum Noreg, Rusland, Ísland og Føroyar tikið seg upp. Júst hetta stríð er ein góð ábending á, at úrslitið av ST-ráðstevnuni rokkur ikki til, tá reglur skula ásetast fyri fiskiskapi eftir ferðandi fiskasløgum. Hetta var annars eitt av endamálunum við at skipa tann felagsskap, sum Løgtingið við samtyktini frá 1. juni 1995 stílaði fram ímóti at fáa stovnaðan.

Tað má haldast vera átrokandi neyðugt, at verulig stig verða tikin at fáa betri skil á fiskiskapinum á teimum leiðum og eftir teimum fiskasløgum, sum nevnd eru frammanfyri, og annars at fáa tamarhald á allari veiðu á havleiðunum uttan fyri 200 fjórðinga fiskimørkini.

Spurt verður tí, hvat er gjørt, og hvat ætlanin er at gera í hesum máli.

13. februar 1996 varð við 23-0-0 atkvøðum varð samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

26. mars 1996 svaraði løgmaður soleiðis:

SVAR

Landsstýrið lat 8. januar 1996 løgtinginum frágreiðing, har víst varð til løgtingsmál nr. 156/1994. Í hesari frágreiðing lýsti landsstýrið tey viðurskiftini, ið vóru umrødd í løgtingssamtyktini frá 1. juni 1995.

Sum svar uppá spurning 1 í fyrispurningimun frá Finnboga Ísaksyni frá 7. februar 1996 var í nevndu frágreiðing upplýst, at tey seks londini saman við ES eftir innbjóðing frá kanadiska fiskimálaráðarranum møttust á fundi í St. Johns í New Foundlandi í døgunum 18. - 19. oktober 1995, og tók Ivan Johannesen,

landsstýrismaður, Føroya vegna, lut á hesum fundi. Skráin var støðan eftir ST-avtaluna um ferðandi stovnar.

Haraftrat og sum svar til spurning 2 í fyrispurninginum, kann upplýsast, at somu 6 lond og ES møtast aftur í Reykjavík 29. - 30. mai 1996. Ætlanin er haraftrat, at Føroya landsstýri verður vertur fyri líknandi fundi í 1997.

Annars verður víst til frágreiðingin, sum fyrr nevnt, var send løgtinginum 8. januar 1996.

100-15 Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann, viðv. víðkaðum samstarvi millum Føroya og Íslands

Ár 1996, hósdagin 7. mars boðaði formaðurin frá soljóðandi fyrispurningi frá Óla Breckmann, løgtingsmanni:

FYRISPURNINGUR

Umhugsar landsstýrið at víðka verandi fiskivinnusamstarv við Ísland til eisini at umfata aðrar búskapar- og samfelagstættir, eitt nú olju, framleiðslu, samhandil og tænastur ?

Viðmerkingar:

Ísland er tað av Norðurlondum, hvørs vinnuligu, søguligu og mentunarligu fyritreytir líkjast mest teim føroysku. Men Ísland hevði sjálvsálit og áræði til longu í 1918 at taka fullveldi og fekk sjálvstýri í 1944. Síðan hevur Ísland ment seg, til tað í dag telist millum heimsins mest framkomnu lond. Fólkatalið er tvífaldað, og livistøðið fleirfaldað síðan krígslok. Av sonnum eitt samfelag, sum hevur bygt sína tilveru á egið tilfeingi og fólksins sjálvbjargni. Eitt samfelag, sum hvílir í javavág við seg sjálvt.

Í verki hava skiftandi stjórnir í Reykjavík víst satt hrøðralag móti føroyingum, m.a. við at lata okkum veiðirættindi eftir botnfiski í íslendskum sjógvi uttan endurgjald.

Nú norðuratlantiski sildastovnurin tykist menna seg aftur, hevur betta givið okkum høvi til at økja fiskivinnusamstarvið millum Føroya og Íslands til gagns fyri báðar partar.

OLJU FYRI FISK

Skuldi hent, at olja verður funnin á føroyskum øki, eiga vit við mótspæli aðrar vegir at tryggja Føroyar sum frægast móti ágangi sunnaneftir. Tí verandi gongd tekur skjótt ræðið á møguligum oljuríkidømi frá okkum. Oljuvinna við Føroyar má ikki fáa eitt hetlendskt mynstur. Politiskt ófrælsa Hetland fær í sín lut bert umf. 500 mió. kr. í oljuavgjaldi árliga. Hetta hóast hetlendska oljuøkið gevur Bretlandi millum 50 og 60 mió. tons av ráolju um árið (somu nøgd sum t.d. Libya og Kuwait) til eitt árligt ráoljuvirði av 25-30 miljardir kr.

Ein líknandi føroyskur dropavinningur frá oljuni av náði frá Danmark upp á nakrar fáar 100 mió. kr. árliga í avgjaldi uttan føroyska framleiðslu aftanfyri kann bert avskepla føroyska búskapin og kostnaðarstøðið enn meiri, enn danski blokkstuðulin higartil og miljarda lántøkurnar í 80-árunum gjordu. Eitt dropaavgjald verður av Tinganesi bert brúkt til at blása almennu peninganýtsluna enn meir upp uttan verulig arbeiðspláss, við tí úrsliti at búskapurin avskeplast enn meiri enn higartil.

Tí er lívsneyðugt, at møgulig olja á føroyskum øki í mestan mun verður innsett til vinnuligt virksemi. Ein máti hevði verið at víðka føroyska fiskivinnusamstarvið við Ísland, har vit lata olju í býti fyri fiskirættindi. Ísland inuflytir fyri umf. 700 mió. kr. av olju árliga. Rætt gaguýttir kunnu íslendsku fiskastovnarnir við sildini geva teimum veiðinøgdir oman fyri 2 mió. tons árliga, sammett við bert max. 200.000 tons (komandi sildakvota íroknað) í ársveiði á føroyskum øki. At samstarva við Ísland um boring niður í føroysku undu-

grundina og, um olja verður funnin, at latið Íslandi føroyska olju fyri veiðirættindi hevði dugnað føroyska búskapinum meiri enn at selt tilsvarandi nogd av olju á heimsmarknaðinum. Fiskiskapur og fiskaframleiðsla hava meiri gaguligar avleiðingar fyri føroyska búskapin enn oljuavgjald utan arbeiðspláss og framleiðslu aftanfyri.

FISKIVEIÐISKIPAN

Íslendingar hava royut handilskvotur í 10 ár við vanlukku fylgjum fyri samanseting av flotanum og stórfalli í landaðum fiskanøgdum. (Sjá viðløgdu talvur: toskaveiðan er fallin niður í triðing av tí, hon var, tá kvotaskipanin varð innført). Íslendingar kundu lært av og tikið í nýtslu líknandi fiskiveiði- og stovnsrøktarskipan, sum føroysku fiskivinnufeløgini hava tilmælt, og sum fær gildi við Føroyar í ár.

INNRÆTTING AV BÚSKAPINUM

Tað hevði harnæst gagnað Føroyum at lært innrættingini av íslendska búskapinum. Smbr. viðløgdu hagtølum er íslendska framleiðsluvirðið (BTÚ) pr. íbúgva nógv lægri, av tí at íslendska skattatrýstið, kostnaðarstøðið, kostnaðurin av almenna sektorinum, og arbeiðsloysið eru nógv lægri enn tað føroyska. Íslendska kappingarførið er tískil nógv betri.

BÍLIGARI INNFLUTINGUR

Handilsliga hava Føroyar fyri og eftir kríggið goldið í ólukkumát fyri tilknýtið til Danmark. Samhandilin við Danmark hevur havt himmalhøgar prísir við sær á innfluttum vørum. Tær koma flestallar til Føroyar úr ella ígjøgnum Danmark, um vit vilja tað ella ikki. Í handilsfelagskapi við Ísland hevdu føroyingar fingið fjølbroyttari innflutningsmynstur og bíligari vøruinnkeyp, sum saman við kostnaðarstøðinum annars hevði stórgagnað vanliga føroyska húsarhaldinum. Ísland kann føra sín egna handilspolitikk. Men Føroyar eru bundnar at donskum handilsavtalum, ið hava kostað 100 tals mió. kr. í óneyðugari vørudýrkan hvørt ár.

Tað er longu nú í tøkum tíma, at landsstýrið tekur upp samráðingar við stjórnina í Reykjavík um eitt víðkað samstarv frameftir, so at vit í Føroyum gera okkum fullgreitt, hvussu neyðugt tað er, og hvussu ríkir møguleikar liggja í búskapinum og politiskum samstarvi við aðrar grannar enn bert tann í landsuðri.

12. mars 1996 varð við 21-0-0 atkvøðum varð samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

14. mai 1996 svaraði løgmaður saleiðis:

SVAR

Seinastu árini er samstarvið millum Føroyar og Ísland økt á flesta økjum.

Íslendskar og føroyskar flutningsfyritøkur samstarva um flutning sjóvegis og avtala er gjørd millum Icelandair og Atlantic Airways, um flogferðasamband millum londini.

Eisini er beinleiðis ferðasamband millum Ísland og Føroyar um summarið, tá ið Norrøna siglur millum londini.

Landsstýrið metir hetta vera positivt.

Politikkur landsstýrisins á hesum øki er miðvíst at arbeiða fyri at gera karmarnar fyri samvinnu betri, bæði við Ísland, eins og við onnur lond.

Í mong ár hava Føroyar og Ísland havt fiskivinnuavtalu. Føroyar hava í mong ár, við stóði í søguligum rættindum, havt botnfiskakvotu undir Íslandi.

Seinastu árini er fiskivinnuavtalan víðkað til at íslendsk skip kunnu veiða svartkjaft, makrel og sild í føroyskum sjógvi, meðan føroysk skip hava havt møguleika at veiða svartkjaft, lodnu og sild í íslendskum sjóøki.

Landsstýrið heldur, at við viðkaða samstarvinum millum partarnar á fiskivinnuøkinum sum fyrimynd, eru ávísir møguleikar at økja samstarvið millum londini.

Í viðmerkingunum til fyrispurningin kemur harra Óli Breckmann við nøkrum uppskotum um hvussu samstarvið landanna millum kann økjast.

Ført verður fram, at tað er umráðandi, at møgulig olja á føroyskum øki í mestan mun eigur at verða umsett til vinnuligt virksemi, og skotið verður upp, at føroyingar skulu lata íslendingum olju fyri fisk.

Eitt annað uppskot er, at íslendingar skulu læra av okkum tá ið tað kemur til at taka av kvotuskipanina. Eisini skjýtur Óli Breckmann upp, at føroyingar eiga at innretta føroyska búskapin eftir íslendskari fyrimynd, og at føroyingar eiga at keypa fleiri vørur úr Íslandi, tí tær eru bílligari har enn í Danmark.

At møgulig olja á føroyskum øki í mest møguligan mun eigur at verða umsett til vinnuligt virksemi er ikki ein áskoðan, ið spyrjarin stendur einsamallur við. Hetta var nakað av tí, ið løgtingið legði deent á í viðgerðini av uppskotinum til lóg um forkaminga av føroysku undirgrundini, og uppskotinum til løgtingssamtyktina frá 24. september 1993, um oljuleiting í føroysku undirgrundini. Hetta er ein setningur hjá oljuráðleggingarnevndini, ið landsstýrið hevur sett at fyrireika uppskot til lóggávu og kunnar fyri eini komandi oljuvinnu í Føroyum.

Tíðin fer at vísa, um olju er í føroysku undirgrundini, og um tað loysir seg at taka hana upp. Eisini kemur tíðin at vísa, um tað hevur nakra meiningin at býta olju um við fisk. Ein fyrirreyt fyri varandi samstarvi er sum kunnugt, at tað er til fyrimuns fyri báðar partar.

Landsstýrið kann ikki annað enn verða samt við spyrjaran í, at tað er gott at føroyingar keypa vørur og tænastur har tær eru bílligast, sjálvandi undir teirri fyritreyt, at kvaliteturin á vørunum og tænastunum er líka góður sum aðrastaðni. Í hesum sambandi kann upplýsast, at influtningurin av vørum úr Íslandi og Bretlandi er vaksin seinastu árini.

100-16 Fyrispurningur til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, viðvíkjandi mannagongd við innkrevjing av skatti

Ár 1996, mikudagin 13. mars boðaði formaðurin frá soljóðandi fyrispurningi frá Bjørn á Heygum, løgtingsmanni:

FYRISPURNINGUR

Í innkrevjingarstarvi sínum fyri tað almenna nýtir Føroya Gjaldstova ymsar innheintingarhættir:

1) Hesir eru vanlig panting við títtøku í fastogn ella leysafe skattgjaldarans við eftirfylgjandi tvingsilssølu fyri á tann hátt at fáa fulnað fyri krávið.
2) Mótrokning í ágóða skuldarans hjá Føroya Gjaldstovu, herundir krøv móti tí almenna í samband við avlopsskatt, løn, tænastu veitingar og sølu av vørum v.m.
3) Eftirhald í lønarinntøka skattgjaldarans við upp til 65% av inntøkuni samb. § 136, stk. 2, í skattalógini.
4) Panting, mótrokning og eftirhald í lønarinntøku hjúnafelagans samb. § 132 og 136, stk. 3, í skattalógini.

Harumfram verður í stóran mun innkravdur fyrnaður skattur.

Vegna tess, at Føroya Gjaldstova í samband við nýtslu av nevndu amboðum í innkrevjingarstarvi sínum ikki sýnist at hava nakrar greiðar reglur at halda seg til, er umráðandi at fáa at vita, hvør mannagongd verður nýtt í dagliga arbeiðinum, og um hetta er rímligt og forsvarlig og í tráð við galdandi lóg og reglur.

Fyri tað fyrsta, so hevur tað týdning at fáa at vita, í hvønn mun grundreglan um eitt lítiðlátað húsarhald samb. reglunum í Rpl. § 509 verður vird í samband við panting av innbúgvi og amboðum skattgjaldarans. Skattgjaldarin hevur samb. nevndu reglu eitt rættarligt krav upp á at varðveita tað mest neyðturviliga til lívsins uppihald, herundir neyðugt innbúgv og amboð til sín og familjuna, soleiðis at tey ikki standa eftir á herum.

Tað hevur tí avgerandi týdning at fáa at vita, hvussu gjaldstovan og pantifútarnir umsita nevndu reglu, og hvørjar fyrisitingarligar ávísingar, teir hava at halda seg til í tílíkum førum.

Viðvíkjandi tí av rættarskipanini viðurkendu mótrokningsrætti í skuld til tað almenna, skal verða spurt um, hvørt tað almenna í tílíkum førum tekur hædd fyri, um talan er um livibreyð hins einstaka, og harnæst um bæði landskassin, kommunur, almennir stovnar, samstarvsfelagar og arbeiðsfólk møguliga kunnu verða fyri álvarsligum fíggjarligum missi vegna eina gjøgnumførda mótrokning uttan undantøk t.d. í samband við, at skuldarar hava átikið sær størri verkætlanir og týðandi veitingar til tað almenna.

Tað er ongastaðni nærri útgreinað, hvussu reglan í § 136, stk. 2, um afturhald við 65% í løn skal umsitast, og hvussu hetta við skili og skynsemi kann fremjast í verki uttan at elva til óneyðugan skaða og sociala armóð.

Talan er nevniliga í fleiri førum um skattaskuld hjá sonevndum láginntøkubólkum, hvørs tilvera frammanundan við vanligum skatti mangan er á markinum til tað sømiliga og forsvarliga.

Í hesum sambandi kundi verið spurt, um hædd verður tikin fyri einum lægsta marki fyri lívsins uppihaldi, t.v.s. um nakað sokallað alment bungursmark er ásett fyri, hvussu nógv kann eftirhaldast í lønarinntøkum hjá t.d. persónum við stórum forsyrgjaraskyldum og teimum lágløntu í samfelagnum.

Viðvíkjandi panting í ognum og eftirhaldi í lønarinntøku hjúnafelagans er tað av stórum týdningi at fáa greiðu á, hví Føroya Gjaldstova sum innkrevjingarvald ikki virðir høvuðsregluna um, at allir møguleikar fyri at innheinta skuldina hjá skattgjaldaranum sjálvum fyrst skulu vera troyttir til fulnar, áður enn verða stig til at innheinta skuldina hjá hjúnafelaganum.

Tað er nevniliga dagligur kostur, at Føroya gjaldstova uttan ávaring og nakra nærri grundgeving leggur hald á meginpartin av løn hjúnafelagans fyri skattaeftirstøður hjá hinum partinum.

Spurt skal tí verða um, hvørji ítøkilig stig evt. eru ella fara at verða tikin til tess at fáa hesi viðurskifti í rættlag?

At enda skal verða spurt, um Føroya Gjaldstova í samband við innkrevjingina nakrantíð formliga hevur fingið álagt ella hevur fingið fyrisitingarligar ávísingar um at halda seg til galdandi fyrningarreglur upp á 5 ár fyri skattaeftirstøður.

Tað er nevniliga ein sannroynd, at hesin almenni stovnur ferð eftir ferð ger seg sekan í hroti á hesar lógarreglur, uttan at hetta fær nakrar avleiðingar fyri innkrevjingarmyndugleikan.

Um so er, at mannagongdin heldur ikki í hesum føri er lógd í fastar karmar, skal verða spurt um, hvørji tiltøk landsstýrið ætlar sær at seta í verk til tess at fáa innkrevjingarstovnin at virða lóggávuna um fyrning av skattakrøvum.

19. mars 1996 varð við 20-0-2 atkvøðum varð samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

24. apríl 1996 svaraði Jóannes Eldesgaard, landsstýrismaður soleiðis:

SVAR

Innkrevjing av fyrnaðum skatti:

Fyri einum trinum árum síðani gjørdi Gjaldstovan eina innanhýsis vegleiðing um burturbóking av skuld, sum hevur mist rættargildi. Henda vegleiðingin virkar í dagliga arbeiðinnum á Gjaldstovuni. Við støði í vegleiðingini hevur Gjaldstova í tveimum umførum ruddað út í skattaskráunum skuld, ið hevur mist rættargildi m.a. fyrnað skuld. Uttan iva hanga enn krøv í skipanunum, sum eru fyrnað, men hesi vera í tí leypandi málsviðgerðini burturbókað. Henda viðgerð hevur støði í vegleiðing nr. 2, sum er nevnd niðanfyri, sokallað "Parkeringsvegleiðingin". Hetta, at tað uttan iva hanga einstøk krøv í skipanini enn, skal síggjast í ljósinum av, at kravsmassin á Gjaldstovuni er umleið 50.000 krøv.

Í nokrum førum er sjálvandi ivi, hvørt skuldarin hevur viðurkent sær skuldina, so at fyrningin er slitin. Í tílíkum málum, skal oftast ein dómur til fyri at staðfesta, hvør av partinum hevur rætt.

Gjaldstovna hevur eini 50.000 krøv liggjandi, so tá ið sagt verður í **stóran mun** av tingsins røðarapalli, so má løgtingsmaðurin Bjørn á Heygum meina við eini 10.000 - 25.000 krøv, sum eru fyrnað. Eg haldi at viðkomandi eigur at útgreina, hvat meinað verður við, tá sagt verður í stóran mun.

Regulgrundarlag, mannagongdir og ætling av arbeiði.

Panting fer fram:

-eftir lóg nr. 40 frá 30. mars 1894, LOV FOR FÆRØERNE OM UDPANTING m.m. við heimild í løgtingslóg nr. 28 frá 29. apríl 1964 um panting fyri skatt.

-sambært VEJLEDNING NR. 9 FOR PANTEFOGEDER PÅ FÆRØERNE frá 11. jan. 1936.

Somuleiðis hevur Gjaldstovan seinastu tíðina gjørt fleiri leiðbeiningar, sum eru grundarlag undir arbeiðinum. Dømi um leiðbeiningar eru:

1. Útroknig av gjaldførleika.
2. Parkering av krøvum (fyribils vegleiðingin er liðug. Verður væntandi liðug í juni).
3. Burturbókin av krøvum, ið hava mist rættargildi.
4. Panting (henda verður útarbeidd í løtuni).

Somuleiðis eru stovnsettar hópin av arbeiðsprocedurum í sambandi við, at DEMM skipanin er innført 11. mars í ár. Dømi um tílíka mannagongdir eru:
- Øll nýggj krøv verða rykt hjá øllum skuldarum.
- Tey, ið ikki gjalda, fáa komuboð (tilsigilsi til pantint).
- Um ikki møtt verður, so verður pantað á bústaðnum.
- Eykatrekk verður aktiverað 13 dagar eftir, at fyrsta áminning er send út.
- Hjúnafelagin verður ikki trektur, fyrr enn viðkomandi hevur fingið persónligt skriv um hetta.

Gjørd er ein innkrevjingarætlan, sum nú verður sett í verk, har settir eru upp málsetningar fyri arbeiði í innkrevjingini, tað ið er eftir av hesum árinum.

Í stóran mun er verkið: "Vejledning for pantefogeder" (Forlaget Kommuneinformation) grundarlagið undir arbeiðinum hjá pantifútanum.

Panting:

Tað hevur tí avgerandi týdning at fáa at vita, hvussu Gjaldstovan og pantifútarnir munsita nevndu reglu (her verður hugsað um regluna í Rpl. § 109 um eitt lítiðlátað húsarhald), og hvørjar fyrisitingarligar ávisingar, teir hava at halda seg til í tílíkum førum.

Tað verða ikki framdar nógvar pantingar í innbúgvi skattgjaldarans, og tá tílíkt fer fram, verður § 509 í rgl. altíð vird. Reglan er præceptiv og merkir hetta, at pantifútin ikki bert ger skuldaran kunnugan um úttøkurættin, men pantifútin sær sjálvur til, at hetta fer fram.

Arbeiðsamboð, virðismess undir kr. 3.000, verða ikki pantað.

Fyrisitingarligu ávísingarnar eru at finna í "Vejledning for pantefogeder" hjá Forlaget Kommuneinformation.

(Vegleiðing um panting verður útarbeidd, og verður væntandi liðng í mai).

Mótrokning:

Viðvíkjandi tí av rættarskipanini viðurkenda mótrokningarrætti í skuld tiltað almenna, skal verða spurt, um hvørt tað almenna í tílíkum førum tekur hædd fyri, um talan er um lívibreyð hins einstaka ....

Tað er semja í teoriini um, at neyðsynjarrætturin ikki skal virðast í sambandi við mótrokning undantikið í sambandi við arbeiðsgevarans mótorokning í løn, samanber Fogedsager s. 1788, Tvangsfuldbyrdelse s. 124 og Udlæg s. 105.

Mótrokning er í høvuðsheitum ikki lógarregulerað og er tí heimilað smbr. vanligum formuerættarligum reglum, og í hesum førum skal neyðsynjarrætturin, sum nevnt, ikki virðast. Men í skattalógini t.d. er álagt skattatuyndugleikanum at mótrokna frestandi skatt í avlopsskatti, áðrenn avlopsskattur verður útgoldin. Í hesum føri skal neyðsynjarrætturin heldur ikki virðast.

... harnæst um bæði landskassin, kommunur, almennir stovnar, samstarvsfelagar og arbeiðsfólk møguliga kunnu verða fyri álvarsligum fíggjarligum missi vegna eina gjøgnumførda mótrokning uttan undantøk t.d. í sambandi við, at skuldarar hava átikið sær størri verkætlanir og týðandi veitingar til tað almenna.

Hvussu kommunurnar kunnu verða fyri fíggjarligum missi av teimum ávum, at Gjaldstovan mótroknar, skilir Gjaldstovan ikki, tí at kommunurnar gjalda ikki út yvir Gjaldstovuna, og tað er nú einaferð so, at fyritreytin fyri yvirhøvur at tosa um mótrokning í penningaligum krøvum er, at tað skal vera eitt "útgjald" tilstaðar!

Í aðrar mátar er hetta ikki so stórur trupulleiki longur við nýggju lógini um at avmarka møguleikarnar hjá teimum, ið hava almenna skuld, at fáa almenn arbeiði at gera.

Hinvegin skal Gjaldstovan ikki, men kann sjálvsagt taka ædd fyri, um nakar verður fyri fíggjarligum missi av mótrokningum sum hesum, og kann ikki dømast at rinda endurgjald fyri henda fíggjarliga miss.

Ásetingin í § 511, stk. 3 í rættargangslógini, sum regulerar rættarstøðuna hjá skuldaranum í sambandi við úttøku hjá skuldaranum í einni "gensidigt bebyrdende kontrakt" geldur ikki mótrokning.

Sambært hægstarrættardómi endugivin í Ugeskrift for retsvæsen (U 1982/24 H) kundi staturin nýta eitt almannarættarligt mótkrav til mótrokning í einum foormúurættaligum høvuðskravi, og sambært U 1982/15 H kundi staturin brúka eitt formúurættarligt mótkrav til mótrokning í einum almannarættarligum høvuðskravi.

Í nevndu dómum slóg hægstirættur fast, at mótrookning kundi gerast, sjálvt um mótkrav og høvuðskrav ikki hvíla á sama, almannarættarliga ella formúurættaliga, grundarlag.

Nógvar atlinningar vóru móti hesm víða mótrokningarrætti. Tí avmarkaði løgmálaráðið, eftir avgerð í stjórnini, við rundskrivi nr. 186/1983 øllum direktoratum og stýrum undir statinum møguleikarnar at mótrokna. Tær kommunurnar - nú skal ein hava í uga, at uppgávubýtið er øðrvísi í Danmark enn í Føroyum; nógv íløguarbeiði verða gjørd í kommunalum og amtsligum regi - sum Gjaldstovan hevur tosað við, fylgja ikki hesum rundskrivi.

Avmarkingin hevði við sær, at staturin ikki skuldi nýta statslig krøv uttan fyri formúurættarliga okið til mótrokning í formúurættarligum krøvum móti statinum.

Rundskrivið frá Løgmálaráðnum er ikki galdandi fyri landskassan, og tá tað ikki er álagt Gjaldstovuni samsvarandi avmarkingar at mótrokna, kann mótroknast millum almannarættarligu krøv landskassans og formúurættarligu krøv skuldarans móti landskassanum.

Hesin spurningur hevur verið royndur við Føroya Rætt, sum við dómi sagdur 21. januar 1986 segði, at "uanset den tilbageholden hed styrelserne i Danmark må antages at udvise efter justitsministeriets skrivelse af 22. novembeer 1983, finder retten - foreliggende retspraksis taget i betragtning - intet grundlag for at anse sagsøgerens tilgodehavende for værende af en sådan beskaffenhed, at sagssøgte skulle være afskåret fra at modregne".

Gjaldstovan skrásetti í 1995, hvussu nógv landskassin mótroknar - tá er mótrokning av avlopsskatti mótvegis írestandi skatti ikki tikin við, og er talan um einar 16-20 mió. kr. um árið, so hetta er ein týðandi postur á fíggjarlógini. Tað kann upplýsast í hesum sambandi, at eftirstøðurnar eru tiknar við á fíggjarlógina, og at ein avmarking í mótrokningarrættinum vil gera, at nettokassaundirskot landskassans vil versna. Hetta merkir so aftur, at landskassin skal útvega meira gjaldføri at fíggja eftirstøðuvøksturin.

Lønareftirhald:

Tað er ongastaðni nærri útgreinað, hvussu reglan í § 136, stk. 2, um afturhald við 65% í løn skal umsitast, og hvussu hetta við skili og skynsemi kann fremjast í verki uttan at elva til óneyðugan skaða og sociala armóð.

Tað stendur einki í sjálvari § 136 um, at neyðsynjarrætturin skal virðast í sambandi við eftirhald í A-inntøku, men bert at eftirhaldið kann í mesta lagi vera 65%. Tað ger tað heldur ikki í viðmerkingunum til § 136.

Men í viðmerkingunum í innganginum til kapittul 13 stendur, at hesi 655% eru eitt avgjørt hægstamark, soleiðis hevur skattgjaldarin altíð eitt rímiligt krav umat fáa útgoldið tað, sumeina og hvørja tíð er ásett sum eitt avgjørt lágmark fyri, hvat ið krevst til lívsins uppihald

Henda áseting átti at staðið í sjálvari lógini, og ikki í viðmerkingunum, tí her verður borgaranum tryggjaður ein so grundleggjandi rættur.

Síðan 1. juli 1991 hevur heimild verið fyri at eftirhalda upp til 20% í lønini í Danmark, sambært § 73 í kildeskatteloven, áðrenn var tað 15% av nettolønini. Við hesi broytingini varð ásett, at neyðsynjarrætturin eisini var galdandi í sambandi við eftirhald í løn, at við eftirhald í løn millum 15% og 20% kundi bert eftirhaldast í løn, umskattamyndugleikarnir positivt vístu, at neyðsynjarrætturin varð virdur. Próvbyrðan liggur á skattamyndugleikunum. Er talan um, at eftirhald í løn upp til 15%, er tað skattgjaldarin, ið skal sannføra skattamyndugleikarnar um, at neyðsynjarrætturin ikki er virdur.

Tað, at ein ávísur automatikkur er lagdur inn í lønareftirhaldið, er heilt einfalt, at forða fyri, at skattamyndugleikin bert kemur at sita og málsviðgera í staðin fyri atkrevja pening inn, og tað er væl tað, sum er endamálið við eini innkrevjingarfunktión.

Landsstýrið hevur í skrivi dagfesting 10. jan. 1992 ásett:

"Landsstýrið hevur á fundi, hin 7. januar 1992, samtykt at áseta eykaafturhaldið til í mesta lagi 15% afturat skattatrekkinum fyri hvørja útgjaldan av A-inntøku til skuldararn. Landsstýrið fer tí at biðja Føroya Gjaldstovu um at hroyta praksis viðvíkjandi eykaafturhaldi fyri eftirstøður hjá persónum, soleiðis at vanliga eykaafturhaldið verður 15%.

Landsstýrið hevur somuleiðis samtykt, at 65%-reglan kann nýtast í serligum førum, har skuldarin hevur eina lutfalsliga stóra eftirstøðu og ikki kann gjalda eftirstøðuna innanfyri eina rímuliga tíð".

Mannagongdin á Gjaldstovuni er:

- Lønareftirhald hjá hjúnafelaga verður bert gjørt við støði í málsviðgerð.
- Lønareftirhald 15% verður gjørt sjálvvirkandi yvir samtíðarskattaskipanina. Skal eykatrekkið lækkast, skal borgarin sannføra innkrevjingarmyndugleikan um, at neyðsynjarrætturin ikki er virdur. Málsviðgerðin fer so vítt gjørligt fram við støði í eini gjaldførleikaútrokning.
- Hevur skuldarin eina lutfalsliga stóra eftirstøðu, og skuldarin ikki hevur gjaldsvilja, t.d. Gjaldstovan fær ikki samband við persónin ella ignorerar allar áheitanir, hækkar Gjaldstovan við støði í málsviðgerð eykatrekkið til 65%. Hettu verður gjørt við eini fráboðan til skuldaran. Endamálið við hesum er at fáa í lag samskifti, tá ið allar aðrar royndir eru miseydnaðar. Tá ið positivur dialogur er fingin í lag, verður eykatrekkið viðgjørt av nýggjum við atliti til neyðsynjarrætt.

Hóast spurningurin hevur eitt løgfrøðiligt snið heldur enn vanliga almennan politiskan áhuga, so vóni eg, at eg við hesum aftursvari havi svarað nøktandi og biði samstundis tingið bera yvir við, at tíðarfreistin ikki hevur verið hildin.

100-17 Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann, viðvíkjandi samráðingum um tollsamgongu

Ár 1996, hósdagin 21. mars boðaði formaðurin frá soljóðandi fyrispurningi frá John Petersen, løgtingsmanni:

FYRISPURNINGUR

Fyrireikar landsstýrið samráðingar um tollsamgongu millum Føroya og ES í staðin fyri verandi handilsavtalu?

Viðmerkingar:

Í mars 1994 legði Svend Aage Ellefsen vegna Fólkaflokkin fram hetta uppskot til samtyktar um samráðingar um tollsamgongu millum Føroya og ES. Eftir aðru viðgerð á tingi fekk málið bert 8-0 atkvøður og fall.

Sum ikki eina ferð var fólkaflokkurin eisini í hesum máli fyri sína tíð. Nú eru tingmenn vaknaðir við kaldan dreym, eftir at tann fríhandilsavtalan við avmarkingum, kvotum og loftum, sum landsstýrið í 1991 samráddist til at galda frá 1. januar 1992, hevur víst seg ónøktandi fyri føroyskan útflutning av m.a. alifiski, nækjum, triðjalandsfiski og góðskaðum fiskavørum.

Brævið frá Jacques Santer til landsstýrið og uppgevandi støða danska uttanríkisráðharrans á Føroya-vitjanini benda á, at handilssáttmáli okkara við ES má endurskoðast.

Nú eru bæði Finland og Svøríki vorðin limir í ES, men Noreg valdi at standa uttanfyri. Serliga tey norsku fylkini, sum liva av fiskivinnu, atkvøddu avgjørt ímóti limaskapi, tí har óttast fólk av beiskum royndum frá fiskivinnuplássum innan fyri ES, at felags fiskivinnupolitikkurin hjá Brüssels við fiskikvotum er oyðileggjandi fyri allan fiskivinnubúskap.

Døpru spádómarnir um, at í Noreg fór at ganga illa, um landið ikki valdi limaskap, hava nú víst seg at vera hurturvið. Har gongur betur enn undan fólkaatkvøðuni. Øvugt gongur verri í Svøríki og Finlandi, eftir at tey bæði valdu at gerast limir í ES.

Sambandsflokkurin hevur verið altráur eftir at lima Føroyar inn í ES sum danskan landslut (sí løgtingsmál nr. 57/1993: Samráðingar við ES um treytir fyri limaskapi). Men eitt kvøldið herfyri í "Degi og viku" hevði løgmaður kúvent og hevði endiliga uppdagað, at nakað er, sum eitur tollsamgonga. (SV-verturin varnaðist

ikki kúvendingina!).

Flestu aðrir tingflokkar hava higartil stungið høvdið í sandin og látist, sum er ES ikki til.

Fólkaflokkurin hevur av tungtvigandi orsøkum staðiliga rátt frá føroyskari innliman.

Í fyrsta lagi er stjórnarskipan okkara so háttað, at vit sum partur av danska ríkinum onga ávirkan fáa á samveldið og missa mest sum alla ávirkan á egin viðurskifti, um Føroyar verða limaðar inn í ES.

Í øðrum lagi er politikkurin hjá ES á fiskivinnuøkinum skipaður á ein hátt, sum hevði komið okkum púrt aftur um brekku, um vit gjørdust partur av ES.

Í triðja lagi er nógv, sum bendir á, at vit tá eisini missa ávirkan á ta oljuvinnu, sum vónandi fer at taka seg upp innan búskaparøkið okkara í næstu framtíð.

Men fólkaflokkurin ásannar, at verandi handilsstøða er ónoktandi fyri búskaparligari menning. Eftir floksins hugsan eiga vit tí heldur at stevna móti eini skipan við ES, sum kann geva okkum flestar av fyrimunum við innliman, men kortini varðveita rætt okkara at taka avgerðir í egnum viðurskiftum.

Ein tollsamgonga við ES kann beina burtur vansarnar við triðjalandsrávøru, og hon kann geva okkum kappingarmøguleikar, sum limalondini hava við sølu av alifiski og øðrum útflutningi. Uttan iva kann hon eisini geva okkum fyrimunir við arbeiðs- og útbúgvingarmøguleikum o.t. í ES-londum.

Á ársfundinum hjá Tingmannaráði Útnorðurs í juni 93 legði føroyska sendinevndin fram uppskot um, at útnorðurlondini í felag skuldu kanna ymisk viðurskifti við tollsamgongu.

Hetta uppskotið vann fulla undirtøku í ráðnum. Men enn er einki úrslit frætt av kanningini.

Tí verður skotið upp, at landsstýrið tekur upp hendan táttin í samtbandi við føroysku samráðingarnar við ES, og tekur upp samrøður við politisku leiðslurnar í Reykjavík og Nuuk.

Við atliti til, at eitt nú oyggin Man, sum hevur líknandi sjálvstýri innan bretska samveldið sum Føroyar innan danska ríkið, hevur tollsamgongu við ES, átti at verið gjørligt hjá okkum uttan ov harðar treytir at broyta okkara verandi handilsavtalu til tollsamgongu.

Eyðsýnliga fara báðir partar at seta hvør øðrum krøv.

Fólkaflokkurin heldur tað vera skilagott at kanna, hvørjar treytir ES setir Føroyum fyri eini tollsamgonguavtalu.

22. mars 1996 varð við 17-0-0 atkvøðum varð samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

26. april 1996 svaraði løgmaður soleiðis:

SVAR

Samgongan hevur lagt stóra orku í at fáa kanna marknaðarviðurskifti við ES.

Landsstýrið setti í februar 1995 eina nevnd at kanna gagnligastu marknaðaratgongdina til ES. Kanningararbeiðið skuldi fevna um øll viðurskifti, ið hava týdning fyri støðutakan já føroyskum politikarum til framtíðarsamstarvið millum Føroya og ES.

Frágreiðingin, ið er almannakunngjørd, varð handað landsstýrinum tann 30. august í fjør.

Í niðurstøðuni sigur nevndin: "Føroyar hava valt at vera uttan fyri meginrákið í evropeiska samstarvinum. Vit eru ikki við í ES, EFTA, ella EBS. Viðurskifti Føroya við ES eru ístaðin skipað í eini handilsavtalu og eini fiskivinnuavtalu. Fyri onnur øki eru ongar avtalur partanna millum. Ein avleiðing av hesum er, at vit

eru vorðin eftirbátur íhandilspolitisku samansjóðingini."

Tilmælini eru at kanna møguleikarnar og treytirnar fyri at fáa annaðhvørt eina serskipan við ES, ella limaskap við undantøkum.

Eitt nú eigur ein serskipan at verða samansett av tollsamgongu og eini EBS-líknandi skipan.

Limaskapur við undantøkum kann verða gjørdur sumt.d. á Álandi, har undantøkini í okkara føri skuldu verið viðvíkjandi fiskivinnu, oljuvinnu, landbúnað og hvalaveiðu.

Landsstýrið hevur ikki tikið endaliga støðu til hesi tilmæli. Hvorja støðu løgtingið hevur í hesum máli fæst møguliga greiði á, tá frágreiðingin hjá landsstýrinum um uttanlandsmál kemur til viðgerðar í næstum.

Løgmaður hevur ikki broytt støðu í hesum máli. Men sum samgonguleiðari er tað mín skylda at arbeiða fyri tí, sumsemja kann fáast um. Í nevndu sjónvarpssending, sum John Petersen vísir til, og eisini føðrumsambandi, havi eg nevnt, at áhugavert kundi verið at kanna fyrra tilmæli hjá nevndim, um politiskur meirituti er fyri tí. Slík loysn hevði umframt fyrimunirnar í eini tollsamgongu eisini veitt okkum møguleika fyri betri atgongd til útbúgving, gransking og arbeiðsmarknað í ES.

Tað sær framvegis út til, at nógvir føroyskir politikarar ikki hava skilt, ella ikki vilja skilja, at tað ikki bert er tollspurningurin, ið forðar fyri búskaparligari menning av tí føroyska samfelagnum. Á heilsufrøðiliga økinum setur ES alt strangari krøv til triðjalond sum Føroyar. Tað eru føroyski virkini, ið skulu rinda fyri hesi krøv.

Tað er ein veruleiki at:

ES keypir meira enn 80% av øllum tí føroyska útflutninginum,
Føroyar keypa meira enn 70% av vørum og tænastum frá ES,
90% av føroyingum, ið ikki búgva í Føroyum, eru búsitandi í ES.

Tí eiga vit at fáa okkara viðurskifti við ES í rættlag beinanvegin.

100-18 Fyrispurningur til Sámal Petur í Grund, landsstýrismanu, viðv. tekstiug av føroyskum SvF-sendingum fyri deyv

Ár 1996, hásdagin 21. mars boðaði formaðurin frá soljóðandi fyrispurningi frá Óla Breckmann, løgtingsmanni:

FYRISPURNINGUR

Ætlar landsstýrismaðurin í mentamálum at bera so í bandi, at SvF-sendingar meiri enn higartil verða tekstaðar fyri deyv.

Viðmerkingar:

SvF slapp eins og aðrir almennir stovnar mestsum snikkaleyst undan búskaparkreppuni. (Tað er sum kunnugt vinnulívið, sum hevur sviðið fyri bakkastið). Umframt, at SvF hevur mestsum sonni inntøkur sum áður, ætlar landsstýrið nú við nýggju lógunum um Útvarp og Sjónvarp at varðveita einkarrættin hjá almennu tíðindamonopolunum, (hóoast tað er brot á § 10 í EU mannarættindar-chartrinum).

Við hesum lógartryggjaða framíhjárætti fylgja eisini tungar skyldur. Stór framstig eru hend við SvF síðan byrjan fyri 12 árum síðan. Umframt SV-tíðindi verða fleiri føroyskar sendingar gjørdar, sum nógv fólk hyggja at. Føst tíðindasending er fyri deyv. Eisini verða fleiri útlendskar sendingar tekstaðar til føroyskt.

Men tær vanligu føroysku sendingarnar plaga ikki at hava føroyskan undirtekst, bíast tær ofta eru gjørdar lidnar væl áðrenn, tær verða sýndar. Talan er sostatt um eina raðfesting av, hvørjar sendingar SvF velur at teksta, heldur enn ein spurningur um tíðarneyð, arbeiðsorku hjá týðarum og tekstarum á stovninum, ella tí tað verður hildið óneyðugt, at føroysku sendingarnar hava undirtekst.

Men ivaleyst elvir tekstloysi undir føroyskum sendingum til stóran sakn hjá teimum føroyingum, sum mugu klára seg uttan hoyrnina. Tey ella teirra gjaldu eisini SvF-hyggjaragjald. Annars kemur politiið eftir teimum sum eftir øðrum.

Tilt uppskot fólkatloksins til samtyktar 24. januar 1994 um teksting av fleiri SvF sendingum fyri deyv, fekk ikki fleirtal á tingi og fall.

Um landsstýrið áleggur SvF at teksta føroyskar sendingar, má síðan verða tikin til, um tað skal kosta stovninum eyka, ella um onkur av teimum 25-30 fólkunum, sum arbeiða fast og leyst á SvF, skulu teksta føroyskar sendingar til gleði og gagn hjá dulum føroyingum, ella hesi skulu bert halda fram at klistra føroyskan tekst uttan á donsku tekststrimlarnar sum higartil.

22. mars 1996 varð við 17-0-0 atkvøðum vurð samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

7. mai 1996 svaraði Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður soleiðis:

SVAR

Spyrjarans niðurstøða er tann, at stór framstig eru hend síðan SVF varð sett á stovn fyri 12 árum síðani. Tað eru væl ikki fleiri meiningar um tað.

Men tá spyrjarin framførir, at SVF slapp nærum snikkaleyst ígjøgnum búskaparkreppuna, so haldi eg, at tað er yvirdrivið.

Fíggjarliga orkan hjá SVF til rakstur er 3,3 mió. kr. minni í inniverandi fíggjarári enn hon var í 1992.

Uppá fyrispurning upplýsir leiðslan í SVF, at teir í dag hava tann politikk, at rásin brúkar umsetingarorkuna til børnini og tey ungu.

Filmir og sendingar til vaksin verða ikki longur umsett, tí orkan er ov lítil til tað. Umsett verður á tann hátt, at børnini skulu hoyra móðurmálið talað, meðan sendingar til tey ungu verða tekstaðar.

Samstundis verður upplýst, at tær fæstu sendingarnar eru lidnar væl undan senditíð. Flestu sendingar eru aktuellar sendingar, sum ikki eru lidnar fyrrenn beint undan senditíð, ella í sonnu løtu tær verða sendar.

Skulu tílíkar sendingar tekstast, so má talan ístaðin verða um at endursenda tær við teksti. Sjónvarpið vil gjarna veita teimum deyvu hesa tænastu, men er ikki før fyri tí, sum er.

Fíggjarliga gangdin í Sjónvarpi Føroya er í løtuni, at truplt er hjá stovninum at halda tørn og tí er ikki møguligt hjá stovninum at seta nýggjar ætlanir í verk.

Undir viðgerðini í mentanarnevndini av framlagda uppskotinum um broytta sjónvarpslóg, hevur leiðslan í sjónvarpinum latið nevndini nøkur hugskot um næsta framtíð, um so er, at sjónvarpinum verða tryggjaðar fleiri inntøkur/tilskot til rakstur.

Landsstýrismaðurin heldur tað ikki vera rett at áleggja SVF nýggjar beinleiðis skyldur í eini tíð, har SVF berjist fyri at yvirliva.

Tað rettasta er at tryggja sjónvarpinum nýggjar inntøkur ella tilskot á fíggjarlógini, samstundis sum landsstýrið kann fara í samráðingar við SVF um, hvat kann gerast teimum deyvu til fraua.

100-19 Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann, viðv. marknaðarviðurskifti Føroya uttanfyri ES

Ár 1996, mikudagin 27. mars bøddi formaðurin frá søljóðandi fyrispurningi frá Jenis av Rana, løgtingsmanni:

FYRISPURNINGUR

Hvørjar ætlanir hevur landsstýrið um, nú marknaðarviðurskifti okkara við ES eru so nágreiniliga kannað, eisini at seta í verk kanning av marknaðarviðurskiftum okkara á marknaðinum uttan fyri ES?

Viðmerkingar:

Sitandi samgonga hevur lagt stóra orku í at fáa kanna marknaðarviðurskifti Føroya við ES. Landsstýrið setti í februar 95 nevnd at kanna gagnligasta marknaðaratgongdina til ES, og legði hetta nevnd fram dripgvi álit 30. august sama ár. Síðani hava bæði løgmaður og uttanlandsnevnd løgtingsins verið í Brússel á vitjan/kanningarferð, og á vitjan í Føroyum var eitt av samráðingarevnunum danska ríkisráðharrans viðurskifti okkara við ES.

Áhugin fyri ES er sjálvsagdur í núverandi støðu okkara, nú nógv størsti partur av útflutningi Føroya fer til hetta marknaðin. Men ikki má gloymast, at 94% av fiskgvum heimsins búgva í londum, sum ikki eru limir í ES, og eru tí hvussu er ein partur av teimum uppfyllandi marknaðir fyri vørur okkara (vørur úr heimsins reinasta umhvørvi).

Havandi hetta í huga, og ikki minst harðrendu støðu ES, um ikki á nakran hátt at veita trongstoddu føroysku tjóðini betri søndir, uttan aftur fyri at fáa fraelsa atgongd til fiskiraetindi í føroyskum sjógvi, er bráneyðugt, at vit venda eygum okkara aðrar vegir og gera nágreiniligar kanningar av øðrum marknaðum (kanningar, sum trongstadla vinnulív okkara neyvan hevur tíggjarligar moguleikar at seta í verk).

Tí vil Miðflokkurin vita, um landsstýrið ætlar at seta í verk eina kanning av øllum alternativum marknaðum til ES, ein kanning, sum vónandi letur eygu okkara upp fyri tí stóra parti av heiminum, sum bóast alt er at finna uttan fyri ES.

28. mars varð við 19-0-0 atkvøðum vard samtykt, at fyrispurningurin ikki skuldi svarast.

26. apríl 1996 svaraði løgmaður soleiðis.

SVAR

Tað hevur stóran týdning fyri meninginni av føroyska samfelagnum, at tingmenn og føroyingar sum heild gera sær greitt, at tað snýr seg ikki um ES ella londini uttanfyri ES. Tað snýr seg um bæði.

Landsstýrið arbeiði alla tíðina við at betra um føroyska marknaðarviðurskiftini uttan fyri ES. Nevnast kann, at Føroyar hava gjørt fríhandilssáttmálar við EFTA londini.

Í alheims samstarvi eru ávísar spælireglur. Skulu marknaðarmoguleikarnir í londunum uttan fyri ES betrast, verða vit noydd at lata aftur fyri, eitt nú tollfría atgongd til føroyska marknaðin ella aðrar søndir.

Samgongan hevur lagt stóra orku í at kanna marknaðarviðurskifti Føroya við ES. Landsstýrið setti í februar 1995 nevnd at kanna gagnligasta marknaðaratgongdina til ES. Frágreiðingin, ið er almannakunngjørd, varð handað landsstýrinum tann 30. august í fjor.

Kanningin varð gjørd í samsvar við tá avtalu, ið flokkarnir, sum mynda landsstýrið gjørdu, tá teir skipaðu landsstýrið.

Vónandi fara tingmenn at taka ES frágreiðingina við í kjakið, tá ið frágreiðingin um utanlandsviðurskifti, ið landsstýrið hevur lagt fyri løgtingið, kemur til viðgerðar.

Aðalorðaskiftið um utanlandsviðurskifti fer at vísa, hvørja støðu løgtingið hevur til, hvønn samskiftishátt við ES Føroyar skulu hava.

Tað er ein veruleiki at:

ES keypir meira enn 80% av øllum tí føroyska útflutningínum,
Føroyar keypa meira enn 70% av vørum og tenastum frá ES,
90% av føroyingum, ið ikki búgva í Føroyum, eru búsitandi í ES, og
ES er okkara næsti granni fyri sunnan, sum ímyndar sama siðnarv og kristnimentan og er partur av sama heimsparti, sum vit hoyra til.

Vónandi fara løgtingsmenn at viðgera okkara viðurskifti við ES í tí álvara, sum hetta hevur fyri samfelagið, vinnuna og borgararnar, har teir eru staddir, í arbeiði ella útbúgving, okkara felags framtíð, og at vit ikki fara at skáka okkum undan hesum spurningum við at skifta orð um viðurskifti, ið einki hald hava í okkara veruligu støðu.

100-20 Fyrispurningur til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismanu, viðv. fleiri mátum at skatta somu fólk

Ár 1996, týsdagin 9. apríl boðaði formaðurin frá soljóðandi fyrispurningi frá Óla Breckmann, løgtingsmanni:

FYRISPURNINGUR

Hvussu og hví ætlar Javnaðarflokkurin at skatta sonevndar "arbeiðsfríur inntøkur" framéftir ?

Grundgeving.

Á landsfundi 23. mars 1996 samtykti Javnaðarflokkurin, at "arbeiðsfríar inntøkur" skulu skattast framéftir fyri at lætta um inntøkuskattin.

Av tí at nývaldi formaður Javnaðarfloksins eisini er landsstýrismaður í fíggjarmálum, er hann helst hin best skikkaði til at greiða løgtingi og almenningi frá, hvussu flokkurin hevur hugsað sær at rokka hesum máli.

Ráðleggingarnevndin og onkur onnur dansk/føroysk endurreisingarnevnd hevur fyrr skotið upp at seta í verk ognarskatt.

Um tað er ognarskattur, sum Javnaðarflokkurin ætlar at seta í gildi í Føroyum, verður tað hervið harðliga átalað, tí øll samansparing, sethús og onnur privat fastogn eru upprunaliga útvegað við lorvunnari inntøku og tískil skattað eina ferð fyrr. Tað er samfelagsliga niðurbrótandi við ognarskatti og hægri rentuskatti at skatta inntøku fleiri ferðir.

Borgarliga merkingin av hugtakinum at breiðka skattagrundarlagið er at útvega tí almenna nóg mikið av inntøkum frá fleiri arbeiðsplássum og stóri inntøkum, men sosialistiska merkingin av hugtakinum er at finna fleiri mátar at skatta sama persónar fleiri ferðir, teirra inntøkur og tøl eftir øllum at dømi samansparing og fastogn.

10. apríl varð við 13-1-6 atkvæðum varð samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

24. apríl 1996 svaraði Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður soleiðis:

SVAR

Føroya Løgting hevur samtykt, at fyrispurningurin frá Óla Breckmann nr. 100-20/95 skal svarast, men eg má viðganga, at eg eri ikki sørt bilsin yvir, at løgtingið hevur samtykt henda fyrispurningin.

Sambæt § 21 í stýrisskipanarlógini er heimilað hvørjum løgtingsmanni við tingsins loyvi at leggja fram eitt hvørt almert mál og tí viðvíkjandi krevja frágreiðing frá løgmanni og landsstýrismanni.

Vísandi til hesa § og vísandi til § 61 í tingskipanini, kunnu tingmenn seta fram fyrispurningar. Tað er álagt bæði løgmanni go landsstýrismonnum at geva tinginum frágreiðing um umsitingarlig og politisk viðurskifti, sumbeinleiðis eru tengd at starvinum í landsstýrinum. Sambæt § 37 í stýrisskipanarlógini hav alløgmaður og landsstýrismenn rættarliga ábyrgd av fyrisitingini av teimum málsøkjum, sum løgd eru til teirm.

Fyrispurningur nr. 100-20/95 er ikki ein spurningur til mín sum landsstýrismann í fíggjarmálum, men spurningurin er til formannin í javnaðarflokkinum. Formaður javnaðarflokksins eins hlíð og lærarin Jóannes Eidesgaard hava skyldu at svara fyrispurninginum á tingi, sum viðvíkja hesum størvum.

Men landsstýrismaðurin í fíggjarmálum vil sjálvandi altíð svara samtyktum fyrispurningum, sum viðvíkja fyrisitingini av hansara málsøkjum.

100-21 Fyrispurningur til Edmund Joensen, løgmann, um hvør verður føroyska luttøkan í komandi føroyskari oljuvinnu?

Ár 1996, mánadagin 15. apríl boðaði formaðurin frá soljóðandi fyrispurningi frá Bjarna Djurholm, løgtingsmanni:

FYRISPURNINGUR

1) Hvussu tolkar landsstýrið ordingarnar í avtaluntu/felagslýsingunum millum stjórnina og landsstýrið síðan 12. okt. 1993 um kolvetnisrávevnini í undirgrundini?

2) Hvussu tryggjar landsstýrið, at føroyskt vinnulív fær sín sjálvsagda rætt at verða við í framtíðar oljuvinnu á føroyskum øki?

3) Hvørja ávirkan hava føroyskir myndugleikar á boriætlanini í Lopra?

4) Hví varð Danop valt til ráðgeva fyri Oljufyrisitingina?

5) Er føroyskt vinnulív tikið upp á ráð undir fyrireikingunum av myndarboringini í Lopra?

6) Hví fekk Maersk-Drilling boriarbeiðið í Lopra, tá felagið ikki var við millum tey felag, sum vóru mett best egnuð?

Viðmerkingar:

So hvørt, sum upplýsingarnir um møguleikarnar at finna olju í undirgrundini eru verðnir meira neyvir og positivir, hevur tað kveikt ta vón millum manna, at framtíðin sum frálíður fer at bjóða okkum betri fíggjarligar møguleikar at búleikast í Føroyum.

Tað, sum tó ørkymlar, er ivin um danir í avtalunum farnu árini við foroyingar longu hava tryggjað sær fullan rætt yvir møguligt oljuríkidømi í føroyskum undirgrundini.

Í protokollatinum frá 12. okt.1993 "...um forhandling mellem den danske regering og Færøernes landsstyre", stendur undir pkt. d m.a:
"I aftalen af 22. desember 1992 tilkendegiver landsstyret at vaere "indstillet på, til gavn for såvel færøske som danske samfunds- og erhvervsinteresser, forudsat konkurrencedygtighed at anvende sagkundskab indenfor dansk forvaltning og forskning samt i danske erhvervsvirksomheder i den færøske råstofudvinding". Landsstyret og regeringen vil snarest i fællesskab overveje udmøntningen heraf".

Í felagslýsingini frá 17. november 1994 millum stjórnina og landsstýrið verður m.a. staðfest, "...at regeringen og landsstyret er fortsat enige om til gavn for såvel færøske som danske samfunds- og erhvervsinteresser.....(sama sum omanfyri). På denne baggrund er regeringen indforstået med, at ministerier og styrelser efter aftale med landsstyret udpeger eksperter, der kan deltage i landstyrets udredningsarbejde på kulbrinteområdet. Bistand udover det hidtidige omfang omkostningsdækkes. Regeringen opfordrer danske selskaber til at gå ind i efterforskningen efter olie og gas på det færøske område på forretningsmæssig basis".

Í felagslýsingini frá 3. nov 1995 millum stjórnina og landsstýrið verður lítið sagt um olju í undirgrundini, men vísi verður harafturímóti til. "... at fælleserklæringen er baseret på og med udgangspunkt i Rammeaftalen af 28. maj 1993 samt efterfølgende aftaler med regeringen".
Sostatt er oljusáttmálan í felagslýsingin frá 17. nov. 1994 framvegis galdandi.
Á undirgrundar- og harvið oljuøkinum røkir Oljufyrisitingin (Ofs) uppgávurnar fyri almennu myndugleikarnar.
Ofs hevur sum kunnugt danska felagið Danop sum ráðgeva. Hetta felag hevur m.a. ábyrgdina av at samskipa borlætlanina í Lopra.
Tað, sum undrar, er, at Ofs sum operatør (byggiherri) eftir øllum at dømna hevur latið allar avgerðir og rætt-indir til ráðgevan Danop og hevur sostatt sagt frá sær møguleikan at ávirka gongdina framyvir.
Hetta hevur við sær, at allar avgerðir sum frálíður verða tiknar í Danmark, samstundis sum øll vitanin verður savnað har eisini.

Sæð frá føroyskum politiskum og vitnuligum sjónarmiði kann henda mannagongd ikki góðtakast.

Síðan farið varð undir fyrireikingar at bora aftur í Lopra, hevur mannagongdin í málinum vakt ans.

Tá endalig avgerð varð tikin at royndarbora, vóru 7 útlendsk felog boðin at geva tilboð. Eitt íslandskt, trý bretsk, tvey týsk og eitt franskt.
Tað sjáldsama við úrslitinum var, at danska felagið Maersk-Drilling, sum ikki var millum teirra, sum vóru metti at hava besta førleikan at standa fyri boringini, og tí heldur ikki í fyrstu atløgu fekk høvi at bjóða, fekk arbeiðið tá avtornaði.
Hvussu leikur er farin í hesum máli er ilt at siga, men tað ljóðar, at Danop varð trýst at senda Maersk-Drilling tillar um aðlaðu boringina, so at hetta felag eisini kundi bjóða.

Tað eru nógvir leysir endar og ósvaraðir spurningar í hesum álvarsmáli. Tí eigur løgmaður, sum umsitur undirgrundarmál, at greiða løgtinginum frá støðuni í oljumálinum. Umframt at svara spurningunum omanfyri, átti løgmaður eisini at skipa fyri, at løgtingið hevur eitt aðalforðaskifti um framtíðar oljuvinnu á Føroyskum øki.

16. apríl 1996 varð við 21-0-0 atkvøðum verð samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

10. mai 1996 svaraði løgmaður soleiðis:

SVAR

Fyrst av øllum vil eg nýta høvi at takka spyrjaranum, hava Bjarna Djurholm, løgtingsmanni, fyri at hava sett fram fyrispurningin, tí við hesum gevur hann mær eitt kærkomið høvi at greiða løgtinginum frá hvussu tey mál, sum umrædd verða í fyrispurninginum hanga saman, tí hæði fyrispurningurin og tær grundgevingar, sum eru givnar fyri honum, tykjast at vera nógv ávirkaðar av teimum misfatanum og skeivu upplýsingunum.

sum hava verið at sæð í fjølmiðlunum seinastu tíðina, bæði um Lopra-verkætlanina og um avtalurnar við ríkismyndugleikarnar um yvirtøkuna av undirgrundini.

Í 1. spurninginum spyr Bjarni Djurholm hvussu landsstýrið tulkar orðingarnar í avtalunum/felagslýsingunum millum stjórnina og landsstýrið síðan 12. oktober 1993 um kolvetnisrævnini í undirgrundini.

Fyri at kunna svara spurninginum, fari eg í stuttum at taka aftur tær avtalur, sum eru gjørdar á hesum øki við danir.

Í 6. pkt. í avtaluni frá 22. desember 1992 millum landsstýrið og donsku stjórnina um yvirtøkuna er ásett, at møguligar inntøktir frá eini framtíðar rævnisvinnu koma at føra við sær samráðingar um lækking av heildarveitingini úr Danmark.

At enda í avtaluni staðfestir stjórnin, at Føroya Landsstýri til fruma fyri bæði føroysk og donsk samfelags- og vinnuáhugamál er sinnað at brúka danskan serkunnleika innan fyrisiting, gransking og innan danskar vinnufyritøkur í føroysku kolvetnisvinnuni, treytað av, at hesin kunnleikin er kappingarførur.

Viðmerkjast skal, at landsstýrið ikki metir hendan partin av avtaluni at vera rættarliga bindandi fyri landsstýrið, men er talan um eina sonevnda ætlanaryvirlýsing frá landsstýrisins síðu.

Áðrenn avtalan varð undirskrivað, høvdu vit havt fyrstu bankakreppuna í oktober 1992, og komu sum kunnugt fleiri tenni á baki.

Í avtaluni, sum varð gjørd millum Danmark og Føroyar í oktober 1993, eftir at tað m.a. varð staðfest at føroysku bankarnir høvdu tørv á 1,3 mill. kr., varð í protokollati til avtaluna millum donsku stjórnina og landsstýrið tann 12. oktober 1993 vísandi til pkt. 6 í avtaluni frá 22. desember 1992, avtalað, at um framt at inntøkur frá rævnisvinnu føra við sær samráðingar um blokkstuðulin, er tað ætlanin hjá donsku stjórnini, a tein partur av hesum inntøkum skal nýtast at minka um møguliga restskuld uppá statslán, sum eru veitt landsstýrinum í sambandi við bankakreppuna og til at betra um fíggjarviðurskifti landskassans.

Sum nevnt ommanfyri, er síðsti partur í avtaluni frá 22. desember 1992 ikki ein løgfræðilig bindandi tilsøgn. Helst fyri at tryggja, at ætlanarlýsingin verður fylgd, verður í protokollatinum tikið aftur í aftur avtalutekstin og síðani lagt aftrat "Landsstyret og regeringen vil snarest i fællesskab overveje udmøntningen heraf".

Frá landsstýrisins síðu var ikki tikið stig til at gera hesa útgreining, meðvarð hildið fram við tí arbeiði, sum lá fyri framman á økinum, nevniliga at fyrireika fyrstu veruligu seismiska kanningarnar av føroysku undirgrundini, eftir at løgtinglóg nr. 179 frá 21. oktober 1993 um forkanningar av føroysku undirgrundini var komin í gildi og at fyrireika tað arbeiðið, sum var álagt landsstýrinum at gera samtbert løgtingsins samtykt í løgtingsmáli nr. 5/1993 umleiting eftir olju og jarðgassi á føroyskum øki.

Danir tóku heldur eingi heinleiðis stig á økinum, men var í Føroyum ein varhugt av, at danir høvdu onkrar ætlanir á økinum, og tá landsstýrið í mai 1994, vísandi til pkt. 5 í avtaluni frá 22. desember 1992, heitti á stjórnina umlegvi at útnevna 3 danskar embætismenn í nýggju oljumiðleggingarnevndina, fekst einki svar. Roknað varð tí við frá føroyskari síðu, at danir fóru at taka málið uppaftur undir samráðingunum, sum upprutaliga skulu vera 17. august 1994, mens um orsakað av løgtingsvalinum í juli 1994 og landstýrisskiftinum, vórðu útsettar til 17. november 1994. Hesin varhugi gav landsstýrinum hovi at gera sær greitt, hvat ynski tess vóru á hesum økinum, sjálvandi við virðing av longu gjørdum avtalum.

Málið var viðgjørt undir samráðingunum 17. november 1994, og varð á hesum fundi eftir landsstýrisins tykki greiða fingin á spurninginum um "udmøntningen", nevniliga at danskir serfroðingar kunnu luttaka í fyrireikingararbeiði á kolvetnisøkinum. Í hvørm mun henda luttaka verður gjørd uttan kostnað, og í hvørm mun landsstýrið skal gjalda fyri hesar tænastur.

Samstundis nýtti stjórnin høvi at heita á danskar fyritøkur um at fara inn í kanningararbeiðið eftir olju og gassi á føroyskum øki eftir handilsligum treytum. Henda fráboðan merkti, at um danskar fyritøkur høvdu væntað sær onkran frammihjáratt, so var við hesi felagslýsing gjort teimum greitt, at so var ikki.

At málið var loyst vísti seg eisini skjótt í verki, tí umfram at svar kom frá forsætismálaráðnum, um at landsstýrið kundi brúka teir omanfyrinevndu serfrøðingarnar í fyrireiingararbeiðinum, kom danska oljufelagið DONG, sum staturin eigur, á vitjun at greiða frá, hvørjir teir vóru og fyri at sigra frá, at teir ætlaðu at vera við í leitingararbeiðinum á føroyskum øki. Sum løgtingsmonnum helst er kunnugt, gjørdi DONG saman við Amerada Hess, Norsk Hydro og LASMO stutt eftir samtak til hetta leitingararbeiði.

Fyri at vísa á, at danskar fyritøkur hava skilt felagslýsingina frá 17. november 1994 á sama hátt, sum eg júst havi greitt frá, kann eg nevna, at í DONG Magasinet stendur m.a. at lesa í nr. 1 frá apríl 1995 um avtaluna millum tey 4 oljufeløgini "Aftalen er udtryk for et vendepunkt i Dansk Olie- og Gasproduktions historie. Det er en ren kommerciel aftale, og vi har således ingen særstatus af statsselskab, sådan som vi har haft det på dans område".

Vísandi til tað, sum er sagt omanfyri, kann eg stutt taka saman um og siga, at eftir mínumtykki skulu avtalurnar við danir tulkast soleiðis:

Inntøkur frá rávnum í undirgrundini skulu umfram at tær føra við sær samráðingar umblokkin, eisini fyri ein part nýtast til at gjalda eina møguliga restskuld til statin aftur.

At vit í fyrireikingararbeiði okkara kunnu brúka danskan serkunnleika, eins og vit í avtaluni frá 22. desember 1992 hava sagt okkum sinnið at brúka henda sakkunnleika, og at danskar fyritøkur kunnu luttaka í kolvetnisvirksemi á jøvnum føti við fyritøkur úr øðrum londum.

Eg havi hug at leggja aftrat, at eftir mínum tykki hava vit higartil havt stórt gagn av tí danska serkunnleikanum vit higartil hava fingið, serliga frá orkustýrinum og DGU, og vóni eg, at vit eisini framyvir kunnu gera nyttu av hesum serkunnleika, sum avtalurnar geva okkum rætt at brúka í fyrireikingararbeiði okkara.

Í spurningi 2 verður spurt, hvussu landsstýrið tryggjar, at føroysk vinnulív fær sín sjálvsagda rætt at vera vi í framtíðar oljuvinnu á føroyskum øki.

Til hetta er at viðmerkja, at landsstýrið síðan viðgerðin á tingi av løgtingsmálum nr. 4/1993: "Uppskot til lóg um forkanningar o.a.m. av føroyska undirgrundini" og nr. 5/1993: "Leiting eftir olju og jarðgassi á føroyskum øki" hevur hildið sær fyri eyga tann týdning løgtingið leggur í, at eitt komandi oljuvirksemi kann gagna føroyskum vinnulívi og føroyskari arbeiðsmegi.

Við hesum í huga hevur landsstýrið álagt oljuráðleggingarnevndini, ið varð sett á várið 1994, m.a. við tveimum limum frá vinnulívinum, at leggja dent á henda spurning í arbeiði sínum.

Somuleiðis hevur í teimum loyvum, sum hava verið givin til forkanningar, og sum hava havt ein ávísan einkarrætt við sær t.d. loyvi til Western, sett sum treyt, at feløgini skulu brúka føroyskar vørur og tenastuveitingar, treytað av at tær eru kappingarførar.

Annars haldi eg ikki orsøk vera til at fara út í ætsir við hesum spurningunum, fyrrenn úrslitið av nevndararbeiðinum verður til skjal. Landsstýrið og løgtingið fáa tá høvi at viðgera spurningin.

Restin av spurningunum viðvíkja allir tí verkætlan, ið nøkur oljufeløg hava fingið loyvi sambæt forkanningarlógini at gera í Lopra.

Hetta mál er í sjálvum sær hvørki serliga týdningarmikið ella serliga tíðkt. Talan er um eitt av mongum forkanningumloyvum og verkætlanin er ikki stór í vavi, umleið 28 mió. kr. Hetta kann verða samanborið við t.d. seismiska verkætlanina hjá Western Geophysical, ið kostaði umleið tað dupulta, ella við fyrru boringin í Lopra í 1981, ið kostaði umleið 11 mió. kr. svarandi til umleið tað dupulta mátt í dagsins peningi.

Men av tí, at tað sum nevnt omanfyri, serliga hava verið bornar nógvar misskiljingar út millum manna hesum máli viðvíkjandi, bæði av politikarum, almenntumstovnum og ávísumfjøltmiðlum, hevur landsstýrið latið fingið til vega eina gjølliga frágreiðing um málið frá avvarðandi myndugleikum. Landsstýrið metir hesa frá-

greiðing at vera fult nøktandi og letur tinginum hana saman við hesum svari. Eisini verður hon send fjølmiðlunum.

Í stuttum kunnu spurningarnir viðvíkjandi Lopra verða svaraðir soleiðis:

Sp. 3. Hvørja ávirkan hava føroyskir myndugleikar á boriætlanina í Lopra?

Tá ið umhugsað varð, hvussu verkætlanin Lopra-2 skuldi fyriskipast, var tað landsstýrisins áskoðan, at hetta skuldi gerst sum einhvør onnur forkanningarverkætlan sambært forkanningarlógini. Tað hevur verið politikkurin hjá teimum landsstýrum, ið sitið hava, síðan málsøkið "ráevni í undirgrundini" varð yvirtikið sum sermál, at forkanningar við kolvetnisleiting í huga skuldu ikki fíggjast av landskassanum. Tær skuldu gerast í tann mun oljuvinnan sjálv hevði hug at seta tær í verk og vilja at bera kostnaðin av hesum. Tískil hevur ongin peningur verið avsettur á fíggjarlógini til slíkar kanningar.

Uppgávu- og ábyrgdarbýtið er sostatt, at myndugleikarnir, t.d. Oljufyrisitingin, halda seg til sín leiklut sum loyvisgevari og eftirlitshavari. Jarðfroðissavnið heldur seg til sín leiklut sum fakligur stovnur. Tann fíggjarliga og verkliga ábyrgdin, harímillum ábyrgdin fyri moguligum skaðilgum árinum, er fult út hjá teimum 18 oljufeløgunum, sum tann 12. januar 1996 fingu loyvi sambært forkanningarlógini til at seta Lopra-2 ætlanina í verk sambært teimum treytum, ið føroyskir myndugleikar hava álagt teimum í loyvinum.

Millum hesar treytir er m.a. fult innlit í tað, sum fyriferst, full atgongd til ta vitan um undirgrundina, ið kemur burlurúr, og størst møgulig luttøka hjá føroyskari arbeiðsmegi og føroyskum vinnulívi. Tað er ein sjálvfylgja, at føroysk lóggáva umframt forkanningarlógina skal haldast, og at neyðug loyvi frá øðrum enn oljumyndugleikum verða fingin til vega á vanligan hátt.

Sp.4. Hví varð DANOP valt til at ráðgeva fyri Oljufyrisitingina?

Spurningurin og grundgevingin fyri honum kunnu skiljast so, at Bjarni Djurholm, løgtingsmaður hevur ta faran, at DANOP er ráðgevi hjá Oljufyrisitingini, men so er ikki.

DOPAS, ið eigur helvtina av DANOP, varð biðið um at vera við til at fyrireika og marknaðarføra verkætlanina, tí at teir høvdu víst málinum áhuga, og vóru tilreiðar at gera hesar fyrireikingar fyri egna rokning. Seinni, tá ið tað eydnaðist at fáa gjørt 18 oljufeløg áhugaði í at vera við at seta ætlanina í verk og at fíggja hana, hava hini 17 oljufeløgini eftir tilráðing frá Oljufyrisitingini latið DOPAS og dóttirfelag tess DANOP taka sær av tí praktiska arbeiðinum í sambandi við verkætlanina. Hetta verður gjørt við ábyrgd mótvegis teimum 18 luttakandi feløgunum øðrumegin og mótvegis føroyskum eftirlitsmyndugleikum hinvegin.

Sp.5. Er føroyskt vinnulív tikið við uppá ráð undir fyrireikingunum av royndarboringini í Lopra?

Lopraboringin er ikki tað, ið vanliga kemur undir heitið royndarboring. Talan er um eina vísindaliga boring við tí endmáli at fáa tilvega vitna um undirgrundina.

Tað er ein av loyvistreytunum, at føroysk arbeiðsmegi og føroyskt vinnulív skulu luttaka mest møguligt í útinningini av verkætlanini.

Oljufyrisitingin hevur í hesum sambandi borið so í bandi og virka fyri, at teir, ið standa fyri boringini hava sett seg í samband við føroyskar fyrltøkur og við felagsskapin Føroya Oljuídnaður, longu áðrenn loyvið varð givið, til tess at trygja best møguliga føroyska luttøku. Hetta sær eisini út til at hava eydnast væl.

Sp.6. Hví fekk Maersk-Drilling boriarbeiðið í Lopra, tá felagið ikki var við millum tey feløg, sum vóru mett best egnað?

Boringin í Lopra skal av trygdargrundum gerast á sama hátt sum oljuboringar. Tað finst einki felag í

Føroyum við royndum í oljuhoring. Tá ið ongar føroyskar fyritøkur sostatt kunnu koma uppá tal, hava føroyskir mundugleikar onga orsøk til at leggja seg út í, hvønn samtykið av 18 oljufelagunum velur at bora fyri seg. Av tí at spurningur um hetta er reistur á tingi, hava føroyskir myndugleikar biðið DOPAS um eina frágreiðing. Sambert hesi frágreiðing var DOPAS í fyrsta umfari ikki kunnugt við, at MAERSK hevði hortútgerð, ið kundi nýtast í Lopra. Tá ið MAERSK gjørdi vart við hetta, varð – við samtykki frá hinum 17 oljufelagunum – MAERSK tikið við á listan yvir borifelag, og kom við tí besta og bíligasta tilboðnum. Tilboðið frá MAERSK var eisini best, tá ið talan var um ætlaða nýtslu av føroyskari arbeiðsmegi og av føroyskum vørum og tænastum.

Annars verður viðvíkjandi spurningi 3 til 6 víst til frágreiðingina, ið úttbýtt er saman við hesum svari.

At enda heitir spyrjarin á løgmann, ið umsitur oljumál, at skipa fyri, at føgtingið hevur ítt aðalorðaskifti um framtíðar oljuvinnu á føroyskum oki.

Til hetta er at siga, at eg eri samdur í, at oljumálið sum heild hevur stóran týdning, og at tørvur er á orðaskifti um høvuðsætlanir í einum kontandi oljupolitikki. Eg haldi tó, at hetta eigur at vera við, tá ið oljuráðleggingarnevndin varandi hevur givið landsstýrinum frágreiðing sína, og landsstýrið fer at leggja uppskot til kolvetnislóg v.m. fyri tingið.

RED: 10 X



Nasjonalbibliotek

Nasjonalbiblioteket
National Library of Norway
Rana Division
N-8607 Mo i Rana
Telephone: +47 75 12 11 11 Telefax: +47 75 12 12 2